# Fiskivinnan sum broytingarambođ hjá amtmanninum

*Bókin er ognað minninum*
*um foreldur míni*

**ERLING ISHOLM**

# Fiskivinnan sum broytingaramboð hjá amtmanninum

*Annales Societatis Scientiarum Færoensis*
*Supplementum 70*

FRÓÐSKAPUR
2020

**Fiskivinnan sum broytingarambo hjá amtmanninum**

© 2020, Erling Isholm
Forsíða: Føroyaprent
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent
Útgevari: Fróðskapur 2020
ISBN 978-99918-65-90-4

*Annales Societatis Scientiarum Færoensis. Supplementum 70*

Stuðlað útgávuni hava:
*Hiddenfjord*
*Granskingarráðið*
*Mentunargrunnur Landsins*
*Varðin*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# *Innihaldsyvirlit*

Fororð ..... 15

**1. partur**
Innleiðsla ..... 19

**1. kapittul**
*Inngangur* ..... *20*
1.1 Granskingarøki og evni ..... 22
1.2 Granskingarsøga ..... 23
1.2.1 Fiskivinnusøga ..... 23
1.2.2 Politisk og umsitingarlig søga ..... 31
1.2.3 Annar íblástur ..... 35
1.3 Bygnaðurin í ritgerðini ..... 37
1.4 Keldugrundarlag og háttalag ..... 39
1.4.1 Kolonisøgulig metoda ..... 40
1.4.2 Komparativ kanning ..... 41

**2. kapittul**
*Ástøði og hugtøk* ..... *43*
2.1 At finna røttu rásina ..... 43
2.2 Javnvágsfellan ..... 47
2.3 Staturin og menningin av honum ..... 49
2.4 Bóndasamfelagið ..... 51
2.5 Modernisering og Føroyar ..... 55

**2. partur**
Bakgrund ..... 59

**3. kapittul**
*Amtmansstovnurin* ..... *61*
3.1 Almenna skipanin fram til Gablatíðina ..... 61
3.2 Einaveldið skipar ríkið í amtir ..... 63
3.3 Gabel stovnar amt og fær Føroyar í len ..... 66
3.4 Føroyar amt longu í 1662 ..... 70
3.5 Umskipanin 1709 ..... 77
3.6 Peter Raben verður stiftamtmaður ..... 82
3.7 Fimm stiftamtmenn afturat saman við Íslandi ..... 87
3.8 Føroyar undir Sælands stiftamtmann ..... 90

3.9 Nýskipanir merkjast í Føroyum 94
3.10 Løbner verður amtmaður 98
3.11 C.L. Tillisch fyrsti amtmaður við løgfrøðiligari útbúgving 107
3.12 Ummæli av embætisverkinum frá 1836 111
3.13 Samandráttur 112

**4. kapittul**
*Einahandilin og útflutningur Føroya* *114*
4.1 Føroyahandilin í miðøld og fram til umleið 1600 114
4.2 Føroyahandil partur av merkantilismuni hjá Kristiani 4. 118
4.3 Hosur avloystu fisk sum høvuðsútflutningsvøra 121
4.4 Gabel tekur við handlinum í 1662 126
4.5 Hosuuppreisturin og hundraðárataksturin 130
4.6 Kongur yvirtekur handilin 1709 136
4.7 Prísurin á ull settur niður í 1723 137
4.8 Hosuframleiðslan veksur 140
4.9 Ullarmangul og fyriskipanin frá 1777 143
4.10 Den Kongelige grønlandske, islandske, finmarkske og færøske Handel 147
4.11 Búskaparligar hugsanir í Føroyum í 18. øld 150
4.11.1 Fysiokraturin Hans Jacobsen Debes 150
4.11.2 Lund handilsforvaltari svarar aftur 154
4.11.3 Økonomisk selskab 158
4.11.4 Svabo ov bundin at fysiokratiskum hugsanum 159
4.11.5 Born kommandantur ger viðmerkingar til Svabo 162
4.12 Fyrsta royndin at innføra fríhandil 164
4.13 Napoleonskríggini 169
4.14 Einahandilin yvirlivir enn eina nevndarviðgerð 170
4.15 Samanumtøka 176

**5. kapittul**
*Fiskivinnuroyndir áðrenn 1830* *179*
5.1 Fiskaútflutningurin minkar 179
5.2 Løgmaður vil menna fiskivinnu 184
5.3 Kapitalistar royna fiskivinnuna í 18. øld 186
5.4 Svabo um fiskivinnu sum triðja vinnan 190
5.5 Born kommandantur eggjar til fiskivinnu 193
5.6 Nevnd knýtir fríhandil og fiskivinnu saman í 1790 197
5.7 Løbner og Nólsoyar Páll - Fiskivinna vandamikil fyri veika statsvaldið 201

5.8 Trý føroysk skip í 1810-árunum 208
5.9 1821-nevndin vildi eisini eggja til fiskivinnu 210
5.10 Bátsbandið 217
5.11 Samandráttur 218

**6. kapittul**
*Hetland – ekstraktivt feudalsamfelag við stórari fiskivinnu* *221*
6.1 Skotskir lairdar yvirtaka Hetland 221
6.2 Royna at koma burtur frá Zetland Method 224
6.3 James Hay og vinnuvirksemi hansara 225
6.4 Fiskivinna við almennum stuðli 228
6.5 Shetland Night-Mare 230
6.6 Samandráttur 232

**3. partur**
Amtmaðurin og fiskivinnan 235

**7. kapittul**
*Fiskivinna kemur aftur á borðið hjá amtmanninum* *237*
7.1 Tillisch tekur málið upp í 1832 237
7.1.1 Amtmaðurin mælir til at menna fiskivinnu 239
7.1.2 Broytingar í Einahandlinum treyt fyri fiskivinnu 240
7.2 Landhuusholdningsselskabet for Færø Amt 243
7.2.1 „Det færøiske Fiskerfartøj“ skuldi slóða fyri 247
7.3 Tillagingar í Einahandlinum í 1834 250
7.4 Handilsspurningurin aftur til viðgerðar 251
7.4.1 Pløyen og Hunderup mæla til at menna fiskivinnu 254
7.4.2 Viðgerðin í Handilsnevndini 257
7.5 Einahandilin á stættatingi 260
7.5.1 Føroyingar vilja eiga part av Einahandlinum 262
7.6 Samandráttur 265

**8. kapittul**
*Pløyen leggur lunnar undir fiskivinnu* *267*
8.1 Spyr embætismenn um fiskivinnumenning 267
8.1.1 Fútin viðmælir 268
8.1.2 Sorinskrivarin svarar 271
8.2 Amtmaður broytir hugsan um Einahandilin 275
8.2.1 Fólksins umboð í handilsmálum 277
8.2.2 Handilsstjórnin heldur fast í gamlari siðvenju 280
8.3 Uppskot Pløyens um eina fiskivinnu 26. februar 1839 284
8.4 Samandráttur 288

**9. kapittul**
*Hetlandsferðin* 289
9.1 Hetlendsk fiskivinna 289
9.2 Hay & Ogilvy 291
9.3 Eygleiðingar av royndum hetlendinga og møguleikar í Føroyum 294
9.3.1 Sluppfiskiskapur 294
9.3.2 Havútróður við línu 295
9.3.3 Møguleikar fyri fiskasølu í Spania 297
9.4 Hay & Ogilvy til Føroya 298
9.5 Bretskir handilsmenn óttaðust Einahandilin 302
9.6 Samandráttur 302

**10. kapittul**
*Ónøgdin við Einahandilin økist* 304
10.1 Kongskvøða við nýggjum ynskjum 304
10.2 Hvassar atfinningar um handilsforvaltaran 307
10.2.1 Pløyen amtmaður klagar um handilsforvaltaran 308
10.2.2 Garde próstur ger misnøgdina almenna 312
10.3 Handilsmyndugleikarnir svara aftur 317
10.3.1 Handilsstjórnin verjir seg 318
10.3.2 Nolsøe svarar aftur 321
10.4 Samandráttur 324

**11. kapittul**
*Vinnuligur útróður og turrur fiskur* 326
11.1 Príspolitikkur ella konjunkturtillaging 326
11.2 Turri fiskurin verður vinnulig vøra 328
11.2.1 Landfiskur aftur at fáa 328
11.2.2 Royna línuna 330
11.2.3 Samband millum avreiðingar og prísir 331
11.3 Samandráttur 333

**12. kapittul**
*Nevnd mælir til fullkomnan fríhandil* 335
12.1 Nevndin 335
12.2 Álit nevndarinnar um føroyska handilin 336
12.2.1 Fyrivarni hjá undanfarnum nevndum 337
12.2.2 Fyrimunir við fríum handli 338
12.2.3 Vansar við fríum handli 338

12.2.4 Niðurstøðan greið 340
12.2.5 Fríur fyri øll ella bara fyri danskar borgarar 342
12.2.6 Inntøkur statsins 344
12.2.7 Fiskivinna skuldi framvegis stuðlast 345
12.3 Kongur og Rentukamarið ivast 347
12.4 Tillisch kabinettskrivari hjá kongi 350
12.5 Samandráttur 353

**13. kapittul**
*Kongligar fiskiroyndir* *354*
13.1 H.A. Clausen á odda 355
13.2 Fiskiskapurin 356
13.2.1 „Seyen“ í 1844 356
*13.2.1.1 Hugsanir Pløyens um fyrsta royndarárið* 357
*13.2.1.2 Carl Irminger hevði metingar um føroyska fiskivinnu* 358
*13.2.1.3 Clausen tekur saman um fyrsta árið* 360
*13.2.1.4 Niðurstøðan hjá Rentukamarinum* 361
13.2.2 „Karen Knuth“, „Hanne & Marie“ og „Jylland“ í 1845 362
13.2.3 Royndirnar í 1846 363
13.2.4 Rentukamarið steðgar fiskiroyndunum 365
13.3 Føroyska manningin 366
13.3.1 Fyrsta fiskimannaverkfallið í føroyskari søgu 368
13.3.2 Royndi at fáa føroyingar umborð á herflotan 370
13.4 Klippfiskavirking í Álakeri 372
13.4.1 Holger Jacobæus virkar fisk í Álakeri 372
13.4.2 Føroyingar fáa møguleika at avreiða ráfisk 374
13.4.3 Virkingin 1845 og 1846 378
13.4.4 Stórur áhugi at avreiða 380
13.5 Útflutningur til Spania 381
13.6 Støðan gjørd upp heystið 1846 382
13.6.1 Lunddahl fúti vildi hava føroyingar at fiska 383
*13.6.1.1 Lítil fyrimunur at fáa danskt vinnulív til Føroya* 385
*13.6.1.2 Fríhandil fortreyt fyri føroyskt riknari fiskivinnu* 387
*13.6.1.3 Gamli felagsskapurin forðaði fyri kapitalismu* 389
13.6.2 Viðmerkingar Pløyens 391
13.7 Samandráttur 394

**14. kapittul**

*Privatar fiskivinnuroyndir í 1840-árunum* ... *395*
14.1 Stuðulsmøguleikin í 1836 ... 395
14.1.1 „Interessantselskap“ í Suðuroy ... 395
*14.1.1.1 Keypa bát í Noregi* ... 397
*14.1.1.2 Hægri prísur setur gongd á* ... 399
*14.1.1.3 Einahandilin framvegis ein forðing* ... 400
*14.1.1.4 Samanumtøka* ... 402
14.2 Príshækkingin í 1841 ... 402
14.2.1 P.C. Knudtzon fær loyvi at fiska ... 403
14.3 Kongligu royndirnar kveikja áhuga hjá privatum ... 405
14.3.1 Skibsteds handil gekk á odda ... 406
*14.3.1.1 Fiskiskapurin hjá Skibsted* ... 407
*14.3.1.2 Havnarmenn fingu nýggjan vinnuveg* ... 409
*14.3.1.3 Royndi at seta gongd á ídnaðargerð* ... 411
*14.3.1.4 Skibsted gerst føroyingur og letur upp úthandlar* ... 413
*14.3.1.5 Hevði Skibsteds handil týdning fyri gongdina fram móti fríhandli?* ... 416
14.3.2 Eiðismenn keypa „Neptunus“ ... 418
*14.3.2.1 Felagsskapurin forðing fyri menning* ... 419
*14.3.2.2 Senda umsókn um lán til Rentukamarið* ... 421
*14.3.2.3 Keypa jakt í Keypmannahavn* ... 422
*14.3.2.4 Søkja um serlig rættindi* ... 423
*14.3.2.5 Fara út um sínar heimildir* ... 426
*14.3.2.6 Innflyta ull og útflyta troyggjur* ... 428
14.3.3 Nólsoyingar byggja deksbát ... 431
14.3.4 Mikkjal í Kristnastovu ... 434
14.4 Innanríkisráðið vildi ikki stuðla ... 437
14.4.1 Handilsforvaltarin vil fiska við „Ebenezer“ ... 438
14.4.2 Jóhan Michael Müller ætlanir um deksfar ... 439
14.4.3 Vágamenn søkja ... 440
14.5 Samandráttur ... 440

**15. kapittul**

*Drúgv politisk viðgerð um avtøku av Einahandlinum* ... *442*
15.1 Avtøka av Einahandlinum fyri Stættatingið ... 443
15.1.1 Berøring med Udverdenen Vehikel for Udvikling af Culturtilstanden ... 443
15.1.2 Stættatingið viðger málið í 1846 ... 446
*15.1.2.1 Fiskivinna fór ikki at gerast grundarlag undir føroyskum búskapi* ... 446
*15.1.2.2 Ymiskar metingar um menningarstig* ... 449

*15.2.1.3 Avtøkan av Einahandlinum partur av størri heild* 451
15.2 Grundlógartingið vildi avtaka Einahandilin 453
15.3 Ríkisdagurin avtekur Einahandilin 455
15.3.1 Fólkatingsins fíggjarnevnd vil avtaka handilin í 1851 456
*15.3.1.1 Fyrsta viðgerð á Fólkatingi* 458
*15.3.1.2 Rosenørn innanríkisráðharri greiðir frá støðu stjórnarinnar* 460
15.3.2 Innanríkisráðið ger lógaruppskot 462
*15.3.2.1 Dahlerup amtmaður sigur sína hugsan* 463
*15.3.2.2 Bang orðar lógaruppskot við fleiri avmarkingum* 466
15.3.3 Løgtingið liberaliserar uppskotið hjá Innanríkisráðnum í 1853 468
*15.3.3.1 Nevndarálitið hjá Løgtinginum* 470
*15.3.3.2 Løgtingið viðger álitið* 473
15.3.4 Ríkisdagurin viðger sítt egna uppskot 1853-54 474
*15.3.4.1 Viðgerðin í Fólkatinginum* 476
*15.3.4.2 Fólkatingsnevnd víðgongdari enn Niels Winther* 478
*15.3.4.3 Próstur steðgar málinum í Landstinginum* 479
*15.3.4.4 Ísland fær fullan fríhandil* 480
15.3.5 Stjórnaruppskotið verður samtykt 481
*15.3.5.1 Uppskotið fyri Landstingið* 482
*15.3.5.2 Fólkatingið samtykkir lógina* 486
15.4 Samandráttur 486

**16. kapittul**

*Útróðurin verður vinnuligur* *489*
16.1 Klippfiskavirkingin økist 490
16.1.1 Rentukamarið heldur fram við virkseminum í 1847 490
16.1.2 Klippfiskavirkingin skipað av nýggjum 492
*16.1.2.1 Jacobæus leitar eftir øðrum starvi* 493
16.1.3 Amtmaðurin og handilsforvaltarin stýra virkseminum í Álakeri í felag 495
*16.1.3.1 Jacobæus fær reglugerð at arbeiða eftir* 496
*16.1.3.2 Carl Emil Dahlerup verður nýggjur amtmaður* 496
16.1.4 Dahlerup víðkar um avreiðingarmøguleikarnar 498
*16.1.4.1 Innanríkisráðið stuðlar Handilsstjórnini* 500
*16.1.4.2 Amtmaðurin roynir at fáa Handilsstjórnina í sín part* 501
*16.1.4.3 Amtmaðurin tryggjar, at virksemið heldur fram í 1850* 503
*16.1.4.4 Keypa bíligari salt í Hetlandi* 504
*16.1.4.5 Ráfiskamóttøka í Klaksvík 1850* 506
16.1.5 Handilsstjórnin vil steðga klippfiskaframleiðsluni 512
*16.1.5.1 Handilsstjónin ger árið 1850 upp* 513

*16.1.5.2 Dahlerup amtmaður verjir klippfiskaframleiðsluna* 514
*16.1.5.3 Royna at sleppa av við Jacobæus* 518
16.1.6 Stytta um móttøkutíðina 525
16.1.7 Fiskamóttøka á Eiði 528
16.1.8 Virksemið í Álakeri árini 1853-55 535
16.1.9 Samanumtøka 538
16.2 Klippfiskur framleiddur av privatum 540
16.2.1 Dánjal á Steig slóðar fyri 541
16.2.2 Klippfiskaframleiðsla í Suðuroy 542
16.2.3 Skibsted roynir seg við klippfiski 545
16.2.4 H.C. Müller sýslumaður tekur móti fiski um veturin 548
16.2.5 Vøra úr havinum størri týdning enn landbúnaður 549
16.3 Samandráttur 552

**17. kapittul**

*Mótstøðan móti fiskivinnuni minkar og fellur* *554*
17.1 Avreiðingarmøguleikin lívstreyt hjá teimum fátæku 554
17.2 Mótstøðan móti línuni tekur seg upp 558
17.2.1 Fuglfirðingar savna undirskriftir at mótmæla línufiskiskapi 558
17.2.2 Málið lagt fyri Løgtingið 560
17.3 Løgtingið ætlar at banna nýggju fiskivinnuni 561
17.3.1 Nevndarálit mælir til bann 562
17.3.2 Uppskotið samtykt 565
17.3.3 Amtmaðurin mælir Innanríkisráðnum frá at seta lógina í verk 567
17.3.4 Kongur stuðlar amtmanninum 569
17.4 Mótstøðan móti línuni harðnar 570
17.4.1 Løgtingið útsetur málið 570
17.4.2 Amtmaðurin kannar línufiskiskap 571
17.5 Línuspurningurin stingur seg upp aftur 573
17.6 Fremmandi fiskiskapurin aftur á dagsskránna 576
17.7 Amtmaðurin frákoyrdur, og Løgtingið vil skipa fiskiskap heldur enn banna línu 577
17.7.1 Línan aftur til viðgerðar 578
17.7.2 Spurningurin tikin uppaftur í 1861 580
17.8 Fugloyingar royna eina seinastu ferð at mótmæla línuni 581
17.9 Norskur serfrøðingur mælir frá avmarkingum 582
17.10 Amtmaður staðfesti, at fiskivinna var týdningarmiklasta vinnan 585
17.11 Samandráttur 587

**4. partur**
Niðurstøða og keldur 591

**18. kapittul**
*Niðurstøða* *593*
Summary 606

Upprunakeldur 608
Bókmentir 612
Navnayvirlit 618

# *Fororð*

Henda ritgerðin er sprottin úr granskingarverkætlanini „Det færøske samfunds transformation – Et helhedsperspektiv på de sociale og økonomiske kræfter der skabte det moderne Færøerne“. Tað var ein tvørfaklig verkætlan, sum granskarar á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya tóku stig til, og sum Granskingarráðið valdi at stuðla í 2013. Stig varð tikið til verkætlanina, tí hildið varð, at tørvur var á at kanna kollveltandi broytingarnar av føroyska samfelagnum í 19. øld úr nýggjum sjónarhornum. Í granskingarbólkinum vóru umframt søgufrøðingar, Hans Andrias Sølvará og eg sjálvur, eisini ein samfelagsfrøðingur, Gestur Hovgaard, og ein geografur, Rolf Guttesen, og málið við at arbeiða tvørtur um fakligu mørkini var at koma fram til nýggja vitan um eitt týdningarmikið tíðarskeið.

Styrkin við á henda hátt at arbeiða tvørfakliga er, at tað letur upp fyri nýggjum sjónarhornum, sum ikki altíð eru líka týðilig í hvørjum faki sær. Fyri hesa ritgerðina vóru tað serliga ymiskar sosiologiskar hugsanir um modernisering og modernitet og áhugin fyri, hvønn leiklut institutiónir ella stovnar hava í at fremja broytingar, sum eggjaðu til at fara at kanna broytingina av føroyska samfelagnum frá einum miðaldarlíkum bóndasamfelag til eitt kapitalistiskt fiskivinnusamfelag við amtmansstovninum sum snúvningsási. Tað vísti seg at vera ein gevandi leið at ganga í sambandi við evnið í hesi ritgerðini.

Tey trý árini, verkætlanin var í gongd, høvdu vit nógvar fakligar fundir saman, har ymisk evni vóru viðgjørd, m.a. tær greinir og tær framløgur, sum vórðu skrivaðar í sambandi við verkætlanina. Eina tíð var Mirjam Joensen í starvi sum granskingarhjálpari hjá bólkinum, har hon savnaði og skipaði hópin var keldutilfari. Bólkurin skipaði fyri nøkrum seminarum fyri fólk, sum høvdu áhuga fyri evninum. Har var høvi at leggja fram tær hugsanir, sum vit vóru komin fram til. Á onkrum av hesum seminarum løgdu viðkomandi útlendskir granskarar eisini fram. Spennandi arbeiðið við hesi verkætlanini gav góðar møguleikar at menna tann spurdómin, sum er evni í hesari ritgerðini. Eg fari at takka granskingarbólkinum og øllum teimum, sum á einhvønn hátt veittu okkum íblástur.

Tá ið gongd var komin á ritgerðararbeiðið, skuldu vegleiðarar finnast. Annar vegleiðarin kann vera ein granskari á Setrinum, men hin skal helst koma frá einum fróðskaparsetri uttanlands. Tað var skjótt at finna fram til fyrra vegleiðaran, tí umframt at vera vegleiðari til hesa ritgerðini er Hans Andrias Sølvará eisini professari á Søgu- og samfelagsdeildini.

Verri var við útlendska vegleiðaranum, tí hvar bar til at finna ein kvalifiseraðan søgufrøðing, sum bæði dugdi at lesa føroyskt og var áhugaður í evninum í ritgerðini. Tað tóktist vera ein ómøgulig uppgáva at finna ein slíkan, men viðhvørt er hepnið størri enn skilið. Brádliga ein dag stendur Beinta í Jákupsstovu

í hurðini á skrivstovu míni og spyr, um eg havi funnið nakran vegleiðara. Tá ið eg svaraði noktandi, segði hon, at hon kendi ein søgufrøðing í Bergen, sum javnan sat og lurtaði eftir føroyskum tíðindum. Tað kundi verið, at hann var eitt boð upp á ein vegleiðara. Tað ljóðaði spennandi, og eg fór at kanna, hvør hesin maðurin var. Tað fyrsta, sum kom undan kavi, var, at hann hevði skrivað eina bók um amtmansstovnin í Noregi. Yngve Flo, sum maðurin æt, vildi fegin átaka sær uppgávuna at vera vegleiðari mín. Hann hevur gjøgnum alla skrivingina av ritgerðini verið mær hollur í ráðum, og hann hevur nakrar ferðir leitt meg aftur á rætta sporið, tá ið hugflogið hevði hug at fara ov langt av leið. Uttan vegleiðingina frá vegleiðarunum báðum hevði eg neyvan komið á mál við ritgerðini, og tí skulu teir eiga eina stóra tøkk fyri stuðulin.

Eg fari somuleiðis at takka starvsfeløgum mínum á Søgu- og samfelagsdeildini fyri stuðul og tol. Vinmenninir báðir Bergur Djurhuus Hansen og Tórður Johannesarson hava frá fyrsta degi av víst arbeiðinum sera stóran áhuga. Teir hava lisið partar av ritgerðini so hvørt og eru trúliga komnir aftur við virðismiklum viðmerkingum og rættingum. Tá ið ritgerðin var um at vera klár at lata inn til metingar, rættlas vermóðir mín, Marna Jacobsen, allan tann langa tekstin, og tað takki eg fyri. Eg fari eisini at takka Súsonnu Debes Hammer fyri at týða samandráttin til enskt.

Ritgerðin varð latin inn til metingar 1. juli 2019, og metingarnevnd varð sett at taka støðu til, um ritgerðin leyk krøvini til eina ph.d.-ritgerð. Formaður í nevndini var Andras Mortensen, fyrsti andmælingur var Hrefna Róbertsdóttir, og annar andmælingur var Kenn Tarbensen. Tey bóru fram virðismiklu viðmerkingar sínar, tá ið ritgerðin varð vard í Kongshøll 8. november í fjør. Eg fari at takka teimum trimum fyri stóra arbeiðið, tey gjørdu í hesum sambandi.

Eftir at ritgerðin var vard, var forlagið Fróðskapur so beinasamt, at tað vildi taka á seg arbeiðið at standa fyri at geva ritgerðina út í bók. Onkrar smærri broytingar og rættingar eru gjørdar í mun til ritgerðina, sum varð latin inn, men stóra arbeiðið við útgávuni hevur kortini verið at finna myndir til bókina. Flestu myndirnar stava frá frálíka myndasavninum á Tjóðsavninum, har Ólavur Øster hevur verið so beinasamur at hjálpt mær at funnið røttu myndirnar fram. Kongliga bókasavnið hevur eisini eitt virðismikið myndasavn, og haðani stava nógvar av persónsmyndunum. At enda hevur Shetland Museum and Archives givið mær loyvi at nýta fleiri myndir úr Hetlandi. Har einki stendur um myndaánara, havi eg sjálvur tikið myndina, og tá er í flestu førum talan um myndir av skjølum á Tjóðskjalasavninum. Eg fari eisini at takka Føroyaprent fyri at átaka sær uppgávuna at seta upp og prenta bókina.

At enda fari eg at takka Rannvá, Simonu og Djóna fyri gott tol hesi árini, ritgerðararbeiðið hevur fylt nakað nógv. Størstu tøkkina eigur kona mín, Tina, fyri at hava eggjað til at herja á aftur, tá ið uppgávulyndið hevði hug at gera vart við seg. Hon hevur alla tíðini verið til reiðar at hjálpt, tá ið onkur snávingarsteinur hevur verið, og serliga dygg var hennara hjálp, tá ið hon virkaði sum ein róðurskvinna,

tá ið síðstu tøkini skuldu takast fram móti degnum, tá ið ritgerðin skuldi latast inn. Uttan hana varð ritgerðin neyvan fullførd.

Hiddenfjord, Granskingarráðið, Mentanargrunnur Landsins og Varðin í Gøtu havi verið so beinasom at stuðla bókaútgávuni av ritgerðini.

Tórshavn 19. september 2020

*Erling Isholm*

# *1. partur*
# *Innleiðsla*

# 1. kapittul
# *Inngangur*

Upprunin til hesa ritgerð kann førast aftur til ta løtuna, tá ið eg las áhugaverdu greinina „Veðurlag, framleiðsla og fólkatal í 1800-talinum og fyrr“, sum Rolf Guttesen skrivaði í greinasavninum *Brot úr Føroya søgu* í 2010. Í greinini bar Rolf fram tveir ikki sørt provokerandi pástandir, sum gingu beint ímóti teirri søguligu grundfatan, sum hevur verið galdandi í Føroyum í langa tíð. Annar pástandurin var, at Gablatíðin ikki var so vánalig, sum hon ofta verður gjørd til, tí hetta tíðarskeið var merkt av vøkstri í fólkatalinum (Guttesen 2010: 57). Hin pástandurin var, at tað ikki var nøkur vanlukka, at aldagamla Løgtingið varð avtikið í 1816, og at Føroya amt varð sett á stovn sama ár.

Grundgevingin hjá Rolf Guttesen var, at ein kanning av fólkavøkstrinum vísir, at fólkatalið í tíðarskeiðinum 1720-1810 vaks við 0,36 % um árið, meðan fólkatalið í tíðarskeiðinum 1810-1830 vaks við 1,42 % um árið. Fyri søguligu geografisku fatanina hjá Rolf Guttesen er henda fýrfaldingin í fólkavøkstrinum avgerandi frágreiðingin upp á stóru samfelagsligu broytingarnar í 19. øld, og eftir er bara at svara spurninginum, hví ella hvussu henda broytingin í fólkavøkstrinum er íkomin. Svarið upp á tann spurningin var sambært Rolf, at Føroyar við Færø amt fingu eina nýggja miðfyrisiting við frælslyntum amtmonnum, sum løgdu lunnar undir at broyta gamla bóndasamfelagið. Hesa gongd var gamla ráðandi stættin ikki fegin um, og fleiri av amtmonnunum „fingu ringt orð á seg, tí teir skumpaðu undir gamlar siðir og privilegiir.“ (Guttesen 2010: 62).

At ein danskur stovnur og ein danskur embætismaður skuldu hava so stóra ávirkan á føroyska søgu, var torført at taka undir við í fyrstu syftu, men onkursvegna varð henda hugsanin hangandi, og við tíðini búnaðist tankin um at fara undir eina verkætlan, har henda hugsan kundi roynast í verki. Áhugi og innlit í hetta evnið øktist, tá ið eg í 2013 gjørdist partur av granskingarætlan á Søgu- og samfelagsdeildini um Føroyar í 19. øld, sum Granskingarráðið stuðlaði. Sum part av hesi granskingarætlan skrivaði eg eina grein um, hvussu virkin amtmaðurin var í at menna eplaveltingina í Føroyum (Isholm 2014). Tann kanningin styðjaði hugsanina um, at amtmaðurin var ein drívmegi í moderniseringini av føroyska samfelagnum fyrra partin av 19. øld, og kelduleitingin í sambandi við greinina vísti skjótt, at amtmaðurin eisini hevði stóran áhuga í at menna eina fiskivinnu. Lítil ivi man vera um, at fiskivinnan var avgerandi fyri moderniseringina av føroyska samfelagnum, og tí var upplagt at kanna, hvønn leiklut amtmaðurin hevði í at fáa gongd á fiskivinnuna.

Vanliga verður sagt, at fiskivinnan tók seg upp, eftir at Einahandilin varð avtikin í 1856. Á tann hátt ber til at siga, at vinnuligt og handilsligt frælsi

vóru grundarlagið undir samfelagsligu broytingini. At henda liberaliseringin av vinnulívi fekk stóran týdning eisini fyri menningina av fiskivinnuni, er einki at ivast í, men almenna skjalatilfarið frá tíðini undan avtøkuni av Einahandlinum gevur skjótt eina aðra mynd av byrjanini til fiskivinnuna og harvið til stóru samfelagsbroytingina í 19. øld, har amtmaðurin hevði ein nógv størri leiklut, enn higartil hevur verið hildið.

Í skjølunum kemur greitt fram, at amtmenninir og aðrir embætismenn vóru púra greiðir um, at Einahandilin var stóri snávingarsteinurin í øllum royndum at fáa gongd á framburð í Føroyum. Men torført var at gera nakað við henda handilin. Eitt var, at allir, sum høvdu nakað við handilin at gera, vildu hava hann at halda fram, og tað sama vildu flestu bøndur, sum fingu ágóðan av góðum prísum upp á ullvørur og støðugum viðurskiftum annars. Eitt annað var, at føroyska samfelagið var so lítið, at stórur vandi var fyri, at tað fór at verða eitt privat monopol, sum fór at taka yvir, um tað almenna monopolið gavst. Soleiðis gjørdist Einahandilin eitt tvíeggjað svørð. Øðrumegin var handilin ein verja móti fríu marknaðarkreftunum, men hinumegin var hann ein forðing fyri tí stóra framburði, sum somu liberalu marknaðarkreftirnar høvdu skapt aðrastaðni í Evropa.

Hetta var gordiski knúturin, sum onkursvegna skuldi loysast, áðrenn føroyska samfelagið kundi gerast partur av modernaða heiminum, sum mentist við rúkandi ferð í grannalondunum. So leingi føroyska samfelagið var skipað soleiðis, at bæði embætismenn og ráðandi bóndastættin høvdu ágóða av Einahandlinum, var sjálvsagt eingin áhugi í at gera nakrar broytingar, og sjálvt um miðfyrisitingin í Keypmannahavn viðhvørt royndi at eggja til broytingar, so var traditionalisman í bóndasamfelagnum so sterk, at hon megnaði at forða fyri teimum flestu nýskapandi átøkunum.

Tað skuldi ein nýggj politisk skipan til, áðrenn broytingar kundu henda, og tað var júst tað, sum hendi í 1816, tá ið avgerð varð tikin um, at Føroyar skuldu hava sín egna amtmann heldur enn at vera ein lítil partur av uppgávunum hjá stiftamtmanninum fyri Ísland ella Sæland. Við einum amtmanni við ovasta myndugleika á flest øllum økjum í Havn varð grundarlag lagt undir eina miðfyrisiting, og hesin stovnur kundi fara undir at fremja neyðugu broytingarnar leysur av áhugamálunum hjá bóndum og einahandilsmonnum.

Amtmaðurin var bara ein maður, so tað hevði stóran týdning, hvør persónur sat sum amtmaður. Fyrsti amtmaðurin hevði verið kommandørur á Skansanum, áðrenn hann gjørdist amtmaður, og sum hernaðarmaður var hann ikki av mest framburðssinnaðu monnum. Tí var tað kanska ikki so løgið, at hann í 1821 mælti frá at fara undir at byggja upp eina fiskivinnu í Føroyum (Nolsøe og Jespersen 2009: 260). Øðrvísi var við teimum eftirfylgjandi amtmonnunum, brøðrunum Tillisch og Christiani Pløyen, tí teir vóru allir ungir, væl útbúnir løgfrøðingar, tá ið teir byrjaðu starvsleið sína í Føroyum.

Fyri teir vóru Føroyar afturúrsigldar, og tí tóku teir stig til ein hóp av ymiskum nýskipanum. Ferð eftir ferð rendu teir seg í trupulleikan við, at Einahandilin var ein forðing, og tí gjørdist tað við tíðini høvuðsspurningurin, hvussu Einahandilin kundi takast av á ein hátt, sum var so lítið skaðiligur fyri føroysku almúguna, sum til bar. Hugburðurin millum ráðandi embætismenninar var púra greiður, at føroyingar ikki vóru til reiðar at taka við fríhandlinum, og uppgávan var tí at menna fólkið til komandi tíðina við fríum handli. Á henda hátt endaðu Føroyar í einari støðu, sum kann samanberast við „waiting room of history", sum indiski søgufrøðingurin Dipesh Chakrabarty hevur nevnt støðuna, har koloniserað fólk verða sett í eina bíðistøðu, til umboðini fyri koloniveldið halda, at tey eru klár at taka ímóti onkrum nýggjum (Chakrabarty 2008).

## *1.1 Granskingarøki og evni*

Vanliga koma fólk ongantíð úr bíðirúminum aftur, men tað hendi ikki í Føroyum. Her vóru ymisk átøk gjørd at fyrireika fólk til fríhandil, og nýggju embætismenninir sóu skjótt møguleikarnar í einari rættiligari fiskivinnu. Teir sóu fyri sær, at ein fiskivinna kundi geva grundarlag fyri, at fólkatalið varð trífaldað, og eftir stuttari tíð mentist hugsanin um, at ein ment fiskivinna var rætti mátin at menna føroyingar til at taka við fríum handli. Við einari nýggjari vinnu kundu nýggjar stættir mennast og ein borgaraskapur spretta í Føroyum, sum var førur fyri at taka av møguleikunum, sum skaptust, tá ið handilin varð gjørdur fríur.

Fiskivinnan var rætta transformatiónsamboðið, sum myndugleikarnir høvdu brúk fyri í royndum sínum at avtaka Einahandilin, so at Føroyar kundu trína inn í modernaða heimin. Fiskivinnan gjørdist tí skjótt høvuðsamboðið hjá amtmanninum í hansara leikluti sum moderniseringsagentur. Hetta leiðir fram til eina hypotesu, sum ljóðar soleiðis:

**Amtmaðurin var avgerandi moderniseringsagenturin í Føroyum fyrra partin av 19. øld. Hann tók stig til at menna eina føroyska fiskivinnu, tí at hon skuldi brúkast sum eitt transformatiónsamboð hjá amtmanninum. Við hesum amboðnum skuldi amtmaðurin niðurlaga einahandilsskipanina og seta hol á karmarnar kring bygdarfelagsskapin. Á tann hátt skaptust møguleikar fyri einum modernaðum kapitalistiskum búskapi.**

Ein slíkur pástandur gongur beint ímóti vanligu søgufatanini, sum higartil hevur verið galdandi um, at t.d. avtøkan av Einahandlinum, endurstovnanin av Løgtinginum og aðrar hendingar, sum hendu, eftir at einaveldið varð avtikið, vóru avgerandi vegamót í moderniseringini av Føroyum. Henda søgufatanin byggir á liberala søgufatan, sum hevur havt lítlan áhuga fyri tí, sum hendi, áðrenn fólkaræðið vann á einaveldinum í 1849, og á tjóðskaparliga søgufatan,

har dentur hevur verið lagdur á, at tað vóru føroyingar sjálvir, sum settu ferð á eina menning í Føroyum, tá ið teir vórðu loystir úr ymiskum einaveldisbondum, sum hildu fólkinum niðri.

Hesar gomlu søgufatanirnar byggja í stóran mun á metodologiska nationalismu, og tørvur er á at gera upp við hana í føroyskari søguskriving. Tann uppgerðin hevur verið í gongd í okkara grannalondum í áratíggju, men enn er verulig gongd ikki komin á eina slíka uppgerð í Føroyum. Tann uppgerðin, sum síðstu árini hevur verið við tjóðskaparligu søguskrivingina, hevur verið merkt av at verið antitjóðskaparlig, men ein slík uppgerð er mest av øllum ein roynd at gera hvítt til svart og byggir tí í grundini á somu fatan, sum tjóðskaparliga søguskrivingin byggir á. Her vantar við øðrum orðum framvegis ein meira modernað søgufatan, har pláss verður fyri at hyggja at øðrum evnum og øðrum frágreiðingum enn teimum, sum fylla mest í tjóðskaparliga diskursinum.

Vónin er, at henda ritgerðin kann vera við til at menna eina slíka modernaða søgufatan, bæði tí at føroysk søgufrøði hevur tørv á tí, men eisini tí at tørvur er á einari modernaðari fatan av føroyskari søgu, um føroysk søguskriving skal liva upp til tann leiklutin, sum hon eigur at hava at skapa føroyskan samleika og sjálvsfatan.

## *1.2 Granskingarsøga*

Í spurningunum omanfyri er greitt, at henda ritgerð er ein samanrenning av tveimum søguligum høvuðsevnum, tí hon fevnir bæði um politiska ella umsitingarliga søgu og búskaparsøgu. Tí er í hesum partinum brúk fyri at gera nakrar historiografiskar eygleiðingar av tí, sum er skrivað um føroyska fiskivinnusøgu og politisku og umsitingarligu søgu Føroya í fyrra helmingi av 19. øld.

### 1.2.1 Fiskivinnusøga

Tann fyrsti, sum av álvara setti sær fyri at lýsa føroyska fiskivinnusøgu, var Anton Degn, sum í 1929 gav út bókina *Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen på Færøerne*. Hann setti sær fyri at finna fram til orsøkirnar til, at „den Næringsvej, som man ifølge Øernes Beliggenhed kunde antage at være Befolkningens vigtigste“, var týdningarmiklari umleið ár 1600, enn fiskivinnan var alla 18. og stóran part av 19. øld (Degn 1929: I). Í bók síni royndi hann við orðunum hjá Leopold von Ranke at „Skildre det omhandlede Tidsrum saaledes som det var“, og tí fór hann ikki inn á at arbeiða við hypotesum, sum tóku støði í, hvussu viðurskiftini vóru tá ella í nútíðini (Degn 1929: II).

Degn ásannaði, at føroyingar í 18. og stóran part av 19. øld fiskaðu lítið meir enn tað, sum brúk var fyri í húsarhaldinum, og fiskur var so at siga ikki nýttur sum miðil at fáa pengar at gjalda innflutningsvørur við. Henda støðan broyttist umleið




*Anton Degn var við bók síni* Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen paa Færøerne *tann fyrsti, sum granskaði føroyska fiskivinnusøgu.*

1840, men Degn hevur ikki nakað beinleiðis boð uppá, hví hon broyttist, og tí man frágreiðingin byggja á, at forðingarnar fyri menning av fiskivinnu hvurvu. Degn segði, at higartil hevði hugsanin verið, at orsøkin til vantandi fiskivinnu var tøknilig, við m.a. vánaligum fiskireiðskapi og lendingarmøguleikum, og handilslig við Einahandlinum, sum forðaði fyri øllum øðrum handli (Degn 1929: 1). Sjálvur helt hann seg vera komnan fram til, at aðrar frágreiðingar høvdu minst líka stóran týdning, og tær fýra týdningarmiklastu vóru, at fólkatalið var ov lítið til at gera annað enn at røkja seyð og annan landbúnað, at vinningurin av hosubindingini var so góður, at eingin tørvur var á at royna aðrar møguleikar, og at giftingarbannið í lógini frá 21. mai 1777 og bátsbandið bundu fólk til bóndagarðarnar (Degn 1929: 2–6). Hann ásannaði eisini, at sjálvt um hesar forðingarnar ikki vóru, so hevði „Fiskeriet alligevel ikke kunnet udvikle sig til nogen Betydning, saa længe Monopolet varede“ (Degn 1929: 10).

Hesa niðurstøðu kom Anton Degn fram til eftir at hava gjørt eitt umfatandi rannsóknararbeiði á Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn. Í arbeiði sínum legði Degn stóran dent á at gera hagfrøðiligt tilfar og út frá tí koma fram til nakrar niðurstøður. Hetta tilfar er hent hjá teimum, sum arbeiða við føroyskari

søgu, meðan Einahandilin framvegis hevði einkarætt í Føroyum, og tí hevur verkið hjá Anton Degn eisini havt stóra ávirkan á tað, sum síðani er skrivað um føroyska fiskivinnu- og handilssøgu fram til 1856. Størsti vansin við bókini er, at einki notuapparat er í henni, og tí kann tað viðhvørt vera mestsum ógjørligt at finna aftur til upprunakeldurnar. Tíbetur liggur rannsóknararbeiði hansara á Tjóðskjalasavninum, so har ber viðhvørt til at finna fram til upprunakelduna í tí, sum hann hevur noterað sær ella skrivað av.

Henda hugsanin, at tað var ógjørligt at menna nakra fiskivinnu, fyrr enn Einahandilin og bátsbandið vórðu avtikin, hevur vunnið hevd í føroyskari søgufatan. Árstølini 1856, tá ið Einahandilin varð tikin av, og 1865, tá ið bátsbandið varð avtikið, hava av tí sama nærum virkað sum ytstu mørk fyri, nær føroysk fiskivinna kundi bera til, og tað, sum hendi framman undan hesum báðum tølum, hevur í mesta lagi verið roknað sum royndir av ymiskum slagi. Eitt av endamálunum við hesi ritgerðini er at vísa eina aðra fatan, har føroysk fiskivinna var komin væl inn á eina menningargongd, áðrenn Einahandilin varð avtikin. Viðvíkjandi bátsbandinum, sum so nógv hevur verið gjørt burtur úr síðani bókina hjá Anton Degn, er at siga, at tað verður sera lítið umrøtt í upprunatilfarinum, sum er gjøgnumgingið í sambandi við hesa ritgerð, og tí fari eg at loyva mær at ivast í, um tað í so stóran mun forðaði fyri, at fiskivinnan kundi menna seg, sum sagt hevur verið. At bátsbandið seinni, tá ið fiskivinnan fekk alsamt størri og størri týdning, kann hava fingið týdning sum forðing fyri framhaldandi menning av fiskivinnuni, er ein annar spurningur, sum sleppur at liggja til okkurt annað høvi.

Tá ið 100 ár vóru liðin, síðani Einahandilin varð tikin av, varð í teimum søgubókum, sum komu út í tí sambandi, styrkt um fatanina av, at mestsum einki bar til, áðrenn Einahandilin varð avtikin. Tvey verk, sum nógv hevur verið víst til líka síðani, komu út í 1955 í sambandi við hátíðarhaldið. Ta fyrru bókina *Føroyar undir fríum handli í 100 ár* góvu Føroya landsstýri og føroysk handilsfeløg út í felag, meðan landsskjalavørðurin Páll J. Nolsøe nýtti høvið til at geva fyrsta bind av stórverki sínum *Føroya Siglingarsøga* út. Hetta bindið fevnir um tíðarskeiðið frá ár 1000 til 1856, og á tann hátt hevur verkið í sjálvum bygnaðinum verið við til at styrkja um fatanina av stóra muninum á tíðini fyri og eftir 1856.

Endamálið við bókini *Føroyar undir fríum handli í 100* ár var ikki at skriva eina handilssøgu, men bert at geva eitt stutt yvirlit yvir handilssøguna fram til 1856, av viðurskiftunum, sum tey vóru um 1856, og taka fram einstakar tættir í vinnusøguni frá 1856 fram til 1956 (Joensen, Mortensen og Petersen 1955: 5). Tað varð gjørt í trimum greinum við hvør sínum rithøvundi.

Fyrstu greinina „Yvirlit yvir søgu Einahandilsins" (Mortensen 1955) skrivaði søgufrøðingurin Arnbjørn Mortensen. Í greinini leitar høvundurin so langt aftur í handilssøguna, sum til ber, og nógv verður gjørt burtur úr 17. øld og serliga Gablatíðini. Víst verður ikki til keldutilfar í greinini, men nógv av hesari elstu søguni tykist byggja á bókina hjá N. Andersen frá 1895 (Andersen 1964). Til




*Føroya landsstýri og føroysk handilsfeløg tóku stig til at skriva eina føroyska handilssøgu í sambandi við, at 100 ár vóru liðin, síðani Einahandilin varð avtikin. Úrslitið var bókin* Føroyar undir fríum handli í 100 ár*, sum kom út í 1955.*

at lýsa 18. øld eru stórir partar av reglugerð fyri handilin frá 2. juli 1781 og kongliga resolutiónin fyri handilin frá 13. august 1790 avskrivað við nøkrum viðmerkingum. Parturin um avtøkuna av Einahandlinum fyllir lítið meir enn tvær blaðsíður (Mortensen 1955: 72–74), og tí er tað serliga til bakgrundspartin um søguna hjá Einahandlinum, at henda greinin hevur verið til nyttu fyri hesa ritgerð. Tó skal leggjast afturat, at høvundurin í endanum á greinini sigur, at avtøkan av Einahandlinum „saman við tí, at føroyingar í árunum frammanundan høvdu lært at virka klippfisk“, var støðið undir nýggjum vøkstri og framburði (Mortensen 1955: 75). Tað samsvarar væl við niðurstøðuna í hesi ritgerðini, men hetta sjónarmið er ikki nærri útgreinað og grundgivið í greinini.

Longu greinina „Undir fríum handli“ (Petersen 1955) skrivaði sakførarin og løgtingsmaðurin Poul Petersen. Hann leggur út við at greiða frá nøkrum av lógargreinunum í handilslógini frá 21. mars 1855, og síðani fer hann undir at lýsa nakrar av teimum stovnum, sum tóku við, tá Einahandilin varð tikin av, og mongu samfelagsskyldur hansara skuldu skipast av nýggjum. Tí ger hann í veruleikanum heldur ikki so nógv við gongdina fram móti avtøkuni av Einahandlinum. Umframt at lýsa hvussu stovnar av ymiskum slag yvirtóku

uppgávurnar hjá Einahandlinum, lýsir Poul Petersen eisini søguna hjá nøkrum av størstu handlunum, sum vórðu settir á stovn, eftir at fríhandilin varð innførdur.

Síðstu greinina „Peningaviðurskifti Bankar og sparikassar" (Joensen 1955) skrivaði cand. polit. Johan K. Joensen. Henda greinin snýr seg serliga um tíðina nakað væl eftir, at Einahandilin varð avtikin, og tí er hon ikki so viðkomandi fyri hesa ritgerðina. Samanlagt er tí lítið tilfar at finna í hesum verkinum, sum er viðkomandi fyri hesa ritgerðina, og tað er ikki sørt margháttligt, tá ið havt verður í huga, hvussu stóran leiklut avtøkan av Einahandlinum hevur í báðum førum. Helst er tað eisini eitt gott dømi um, at stórur munur er á fatan av hesum fyri føroyska søgu so týdningarmikla tíðarskeiði.

Páll J. Nolsøe lýsir sjálvur sítt verk *Føroya Siglingarsøgu* sum eina roynd at siga frá siglingarsøguni, frá tí at skrivligar keldur eru at fara eftir (Nolsøe 1984: 3). Hansara søgufatan er rættiliga idealistisk og tjóðskaparlig, sum t.d. sæst aftur í hesi stuttu útgávuni av søguni um menningina av fiskivinnuni:

> Vit kenna tó einstakar føroyskar siglingarmenn í hesum langa tíðarskeiði, men ikki fer at lýsa í fyrrenn í byrjanini av 19. øld, tá ið Føroyingar eiga fyrsta skipið aftur síðani miðøld, venjast til sjómenn á skipsdekki og leggja støðið til ta vinnu, sum eigur lívið í samfelag okkara í dag. (Nolsøe 1984: 3)




*Fyrsta bindið av* Siglingarsøguni *hjá landsskjalavørðinum Páll J. Nolsøe kom út í 1955.*

Siglingarsøgan er skipað í ymiskar persónssøgur um menn, sum annaðhvørt hava verið úti í heimi og siglt ella sjálvir hava fingið sær skip, við einstøkum undantøkum, har kapitlar eru, sum eru minni persónsbundir. Sum heild merkist, at fyrsta bindið í *Siglingarsøguni* í stórum drøgum fylgir lýsingini í bókini hjá Anton Degn av royndunum at fáa fiskiskip í Føroyum, og so byggir høvundurin víðari upp á teir partar av søguni, sum hann heldur vera serliga áhugaverdar, ella har hann hevur funnið fram meira áhugavert tilfar. Tann parturin, sum verður lagdur afturat, er ofta avskrivingar av upprunaskjølum, so at bókin til tíðir kann virka meira sum eitt keldusavn enn sum ein søgubók, men tað ger ikki bókina verri, tá ið hon skal nýtast til víðari gransking. Við tí einfalda málinum at siga frá siglingarsøguni er tað helst einki at siga til, at bókin fyrst og fremst er ein frásøgn, og at greiningarnar eru fáar. Heldur eingin yvirskipað meting av menningini av siglingarsøguni er at finna í bókini, og tí sleppur tann heildarfatanin, sum endurgivin er omanfyri, at verða standandi.

Næstur at leggja fram sína útgávu at føroyskari fiskivinnusøgu var Erlendur Patursson, ið sum formaður í Føroya Fiskimannafelag í 1961 gav út eina fiskivinnusøgu í tveimum bindum sum fimmti ára minningarrit til felagið (Patursson 1961a og Patursson 1961b). Erlendur var útbúgvin búskaparfrøðingur, og í mun til idealistisku *Siglingarsøguna* hjá Páll J. Nolsøe, hevur Erlendur eina greiða marxistiska søgufatan, har hagtøl eru avgerandi fyri søgufatanina, og langt er millum nøvnini. Hagtølini hjá Erlendi hava líka síðani verið nýtt av øðrum søgufólkum.

Umframt at vera formaður í Fiskimannafelagnum var Erlendur eisini formaður í Tjóðveldisflokkinum, og tað gjørdi helst sítt til, at tjóðskaparliga søgufatanin, sum longu varð týðilig í omanfyrinevndu verkunum, gjørdist enn týðiligari. Bátsband, giftingarbann og kongligur einahandil passaðu sum fótur í hosu í tjóðskaparligu søgufrásøgnina um eina kúgaða tjóð, sum noyddist at berja seg úr øllum tí, sum bant tjóðina niður. Henda fatan sæst longu á fyrstu orðunum í innganginum, har Erlendur sigur: „Við avtøku útlendska einahandilsins um miðja 19. øld varð føroyska samfelagið loyst úr aldargomlum fjøtrum. Nýtt tíðarbil í søgu landsins og fólksins tók við.“ (Patursson 1961a: 3). Við slíkari søgufatan er torført at fáa eyga á leiklutin hjá amtmanninum í moderniseringini av samfelagnum, tí hann umboðaði sjálvandi eisini fremmant vald. Tí loypir Erlendur í niðurstøðu síni um tað tíðarskeiðið, sum henda ritgerð fevnir um, upp um síðstu árini, áðrenn Einahandilin varð avtikin. Á tann hátt kundi hann varðveita fatanina av, at avtøkan av Einahandlinum var altavgerandi fyri menningina av fiskivinnuni og skriva:

> Fyrr er nevnt, at útróðrarveiðan 1841-50 var um leið 400 tons í saltfiski í árligum miðaltali. Aftaná at handilin var vorðin frælsur, vaks útróðrarveiðin í stórum. Longu 1859 og komandi ár var hon um leið 3 ferðir so mikil sum í miðal árini 1841-50. (Patursson 1961a: 22)




*Í sambandi við fimmti ára dagin hjá Føroya Fiskimannafelag í 1961 skrivaði formaður felagsins Erlendur Patursson bøkurnar* Fiskiveiði – fiskimenn.

Hetta hevur í stóran mun verið almenna søgufatanin síðstu mongu áratíggjuni, og henda ritgerðin er í hvussu er partvís ein uppgerð við hesa fatan.

Tann næsti søgufrøðingurin at skriva um føroyska fiskivinnusøgu var Jóan Pauli Joensen, sum í 1975 gav út doktararitgerð sína *Færøske sluppfiskere*, sum verður lýst sum ein siðsøgulig kanning av einari vinnugrein (Joensen 1975). Her er talan um eina siðsøguliga kanning av fiskivinnusamfelagnum, sum kom eftir tíðina, sum er evnið í hesari ritgerðini, og tí er tað ikki beinleiðis viðkomandi, men Jóan Pauli hevur eisini nakrar hugleiðingar um søguligu bakgrundina fyri slupptíðini, og har ásannar Jóan Pauli m.a., at eftir teir konservativu embætismenninar í byrjanini á 19. øld, „kom der en ny type embedsmænd fra udgangen af den første tredjedel af det 19. århundrede, som forsøgte sig som katalysatorer i de sociale og økonomiske fremskridt på øerne." (Joensen 1975. 19). Meir verður kortini ikki gjørt við henda partin enn at nevna hetlandsferðina hjá Pløyen í 1839 og úthandlarnar, sum komu um somu tíð, við støði í teimum verkum, sum eru umrødd omanfyri.

Jóan Pauli nevnir týdningin av, at Einahandilin varð avtikin, men fyri hann er tað meira áhugavert, at bóndasamfelagið spakuliga broyttist, „og gav plads til ændrin-

*Jóan Pauli Joensen fekk í 1975 doktaraheitið fyri ritgerðina* Færøske sluppfiskere.




ger i næringslivet." (Joensen 1975: 21). Í sjálvari doktararitgerðini gjørdi Jóan Pauli ikki so nógv við hesar broytingar, men í umfatandi granskingararbeiðinum, hann síðani hevur givið út, hevur hann útgreinað hetta evnið nærri. Í verkinum *Fiskafólk* frá 1982 endurtók hann týdningin, teir nýggju embætismenninir fingu, men hann avmarkaði seg til at vísa á stovnseting av sparikassa og bókasavni og áhugan hjá Pløyen amtmanni fyri fiskivinnuni. Hann helt eisini framvegis fast í fatanini av, at „tað, sum kortini kom at fáa størsta týdning, var, at einahandilin varð avtikin í 1856." (Joensen 1982: 506). Hann tykist ikki at hava lagt stóran dent á allar tær fyrireikingarnar, sum vóru gjørdar til at avtaka Einahandilin, og tann týdning hesar fyrireikingar høvdu fyri moderniseringina av samfelagnum.

Í bókini *Folk og fisk* frá 1985 sigur Jóan Pauli, at sjálvt um tað gekst striltið at broyta føroyska útróðurin, so hendu broytingar kortini. „Disse skete fortrinsvis på to måder, nemlig ved en centralt dirigeret påvirkning, udøvet af embedsmændene, og en påvirkning på græsrodsniveau opstået af kontakten mellem færinger og fremmede fiskere – især shetlandske." (Joensen 1985: 39). Henda seinna ávirkanin, sum Jóan Pauli ger meira burturúr, var treytað av, at Einahandilin var tikin av, tí tá kundu hetlendsku sluppirnar leggja at landi í Føroyum at keypa bíligt tubbak og brennivín (Joensen 1985: 41). Hin fyrra

ávirkanin, tann hjá embætismonnunum, stendur mestsum einsamøll sum ein staðfesting, men hon leggur upp til nærri gransking, og tað er júst tað, sum gjørt verður við hesi ritgerðini.

Fatanin, sum her er lýst av byrjanini til føroyska fiskivinnu, er fleiri ferðir síðani endurtikin í søgubókum, sum so ella so koma inn á evnið, men teir einastu, sum hava lagt nakað nýtt afturat, eru Kári Jespersen og Jens Pauli Nolsøe, sum í verkinum *Havnar søga* fleiri ferðir koma inn á fiskivinnusøguna.

Fyri hesa ritgerðina er tað serliga seinni partur av bindi 3 í *Havnar søgu*, sum er viðkomandi. Har verður søgan hjá Kongliga einahandlinum tey síðstu 40 árini frá 1816 til 1856 viðgjørd, og niðurstøða teirra er, at tað eigur at verða gjørt upp við fatanina av, at avtøkan av Einahandlinum var týdningarmesta orsøkin til, at vinnulívið mentist, tí „sum vit hava sæð, er hetta ikki so". (Nolsøe og Jespersen 2009: 360) Hesa niðurstøðuna koma teir m.a. til við at taka við tey tølini yvir fiskaútflutningin árini 1850 til 1856, sum Erlendur Patursson ikki hevði við í sínari niðurstøðu, tí tey vísa, at tað var vøkstur í fiskivinnuni, áðrenn Einahandilin varð avtikin. Tí kann henda avtøkan ikki verða einasta frágreiðingin upp á menningina av hesari vinnuni, sum fekk so avgerandi týdning fyri føroyska samfelagið. Í verkinum hava høvundarnir eisini funnið fleiri keldur, sum varpa nýtt ljós á leiklutin hjá tí almenna í broytingunum av samfelagnum, og á tann hátt hevur *Havnar søga* verið ein týdningarmikil íblástrarkelda til hesa ritgerð. Í *Havnar søga* 3 verða fleiri av teimum somu viðurskiftunum, sum verða viðgjørd í hesi ritgerðini, umrødd, so neyvari viðmerkingar til hana verða tiknar fram, har tær eru viðkomandi.

### 1.2.2 Politisk og umsitingarlig søga

Nógv er skrivað um politisku søgu Føroya, men tað mesta viðvíkjandi tíðarskeiðinum, sum verður kannað í hesari ritgerðini, er at finna í yvirlitsverkum og sum bakgrundskapitlar í verkum, sum snúgva seg um nýggjari evni. Tó eru tvær ritgerðir, sum beinleiðis snúgva seg um tíðina í fyrra helmingi á 19. øld. Tær eru *Færøernes stilling i det dansk-norske rige indtil 1855*, sum Róland Høgnesen læt inn sum høvuðsritgerð í 1968 (Høgnesen 1968), og doktararitgerðin *Et Færø som Færø*, sum Jákup Thorsteinsson vardi á Aarhus universiteti í 1990 (Thorsteinsson 1990).

Í ritgerð síni greiðir Róland Høgnesen frá føroyska lógarøkinum, og hann ger eisini nógv burtur úr søguni hjá løgtinginum og løgmansembætinum. Fyri hesa ritgerðina er tað mest áhugaverda, at hann í síðsta parti av ritgerðini, sum fevnir um góðar 20 síður, gongur gjøgnum søguna um amtmansembætið. Hansara høvuðsniðurstøða varð, at stjórnin ongan „bevidst" politikk hevði Føroyum viðvíkjandi. Hjá myndugleikunum í Keypmannahavn ráddi um at finna praktiskar loysnir upp á teir trupulleikarnar, sum stungu seg upp, og tí er menningin av almennu stovnunum í Føroyum merkt av stórari tilvild (Høgnesen 1968: 83).

Tilvildin sæst eisini aftur í ritgerðini hjá Jákupi Thorsteinsson, tí allar tær kollveltandi politisku broytingarnar, sum hendu í Danmark í 1830-árunum og 1840-árunum, høvdu við sær, at loysnir skuldu finnast fyri, hvat gerast skuldi við Føroyar. Í ritgerðini ger Thorsteinsson upp við tað ov tjóðskaparligu fatanina, sum hevði verið galdandi viðvíkjandi endurstovnanini av løgtinginum og tinglýsingini av grundlógini. Tey uppskotini, sum Stættatingið viðgjørdi Føroyum viðvíkjandi, um t.d. skúla og fríhandil, kunnu sambært Thorsteinsson skiljast sum, at „man fra dansk side har taget skridt til en moderniseringsproces af det færøske bondesamfund, der både i materiel og dannelsesmæssig henseende skulle fremme udviklingen *fra* bønder *til* færinger" (Thorsteinsson 1990: 333). Henda moderniseringsgongdin hevði við sær, at Føroyar vórðu tættari knýttar at danska samfelagnum, og at tað „ligefrem udsattes for en mærkbar fordansknings-integrationsproces i *politisk* så vel som *kulturel* henseende." (Thorsteinsson 1990: 332).

Sostatt gjørdi moderniseringin, at føroyingar gjørdust borgarar, men hon hevði eisini við sær, at mentanarliga danska ávirkanin gjørdist so stór, at borgararnir reageraðu og fóru at virka fyri føroyskum tjóðskapi. Tjóðskaparkenslan var kortini ikki kveikt mitt í 19. øld, og tí fingu føroyingar sína stjórnarskipan, „fordi der i danske kredse...var ønske om et færøsk lokalstyre med et vist mål af demokrati." (Thorsteinsson 1990: 337).

Tað er søguna um leiklut Føroya og viðgerðina av føroyskum viðurskiftum á stættatingi og í fólkaræðisligu tilgongdini at smíða nýggja grundlóg og við henni vallógir til fólkatingið og seinni eisini løgtingið, Thorsteinsson viðger. Hetta ger hann væl og virðiliga, og tí nýtist mær ikki at gera annað enn vísa til hansara, tá ið evnið, sum her verður viðgjørt, viðhvørt fer eitt sindur yvir í tað politiska. Tað skal tó sigast, at gjøgnumgongdin av serliga kopibókunum hjá amtmanninum greitt vísir, at spurningurin um politisku støðu Føroya í teimum umfatandi broytingunum, sum vóru hesa tíðina, fyllir merkiliga lítið og nógv minni enn tað vinnuliga. Út frá tí er týðiligt, at amtmaðurin var væl meira áhugaður í teimum vinnuligu broytingunum, enn hann var í teimum politisku.

Bretin John F. West hevði sera stóran áhuga fyri føroyskari søgu, og serliga var tað 18. øld, sum hugtók hann. Hann hevði ætlanir um at geva út eitt stórverk um Føroya søgu frá 1709 til 1816, har hann vildi geva „a full understanding of the course of Faroese history during the eighteenth century by working from original sources" (West 1985: 8). Hetta verkið er framvegis ófullfíggjað, tí West náddi bara at skriva fyrsta bind, sum fevndi um tíðina frá 1709 til 1723. Hetta var ein týdningarmikil broytingartíð, tí Gablatíðin endaði, og staturin og hansara menn fingu aftur áhuga í, hvat hendi í Føroyum. Í hesum tíðarskeiðinum vórðu Føroyar eisini lagdar undir íslendska stiftamtmannin, og tí er tað sjálvsagt, at hetta verk hevur verið hent at nýtt til at lýsa hetta tíðarskeið. Harumframt eigur at verða nevnt, at tað er forloysandi at lesa bókina hjá West, tí sum breti, ella kanska heldur sum hvørki føroyingur ella dani, er hann leysur av teimum

bindingum, sum ein inngrógvin tjóðskaparfatan ofta setur á hugflogið. Hjá West ger tað m.a., at føroysk søga í størri mun, enn vanligt hevur verið, verður sæð úr einum breiðari evropeiskum sjónarhorni.

John F. West skrivaði longu í 1972 eitt yvirlitsverk um føroyska søgu nevnt *Faroe – the emergence of a nation* (West 1972). Hetta er framvegis eitt nógv nýtt verk, serliga tí at tað er ein av sera fáum heildarsøgum um føroyska søgu á enskum máli. Nógv minni kend er ph.d.-ritgerð hansara frá 1975 *The changing character of Faroese communal land tenure during the nineteenth century* (West 1975). Í ritgerðini vildi hann vísa, hvussu umsitingin av jørðini í føroysku bygdunum broyttist í 19. øld „exceptionally for Europe without general enclosure." (West 1975: i). Talan er við øðrum orðum um eina lýsing av moderniseringini av landbúnaðinum í 19. øld, og á tann hátt er evnið ikki langt burtur frá evninum í hesari ritgerðini. Víst verður til West, har hann hevur givið íblástur.

Av yvirlitsverkum hevur fyrsta bind av *Løgtingið 150*, sum Hans Andrias Sølvará skrivaði í 2002 í sambandi við, at 150 ár vóru liðin, síðani Føroya løgting varð endurstovnað, verið serliga hent. Í tí verkinum verður søgan sjálvandi viðgjørd við løgtingsstovninum sum sjónarhorni, meðan dentur í hesi ritgerðini er lagdur á amtmansstovnin. Løgtingið og amtmansstovnurin eru tvær síður av somu søk, men viðhvørt verður søgan eitt sindur øðrvísi, tá ið greitt verður frá amtmanssíðuni.

Hans Andrias hevur síðani skrivað fleiri verk um politisku søgu Føroya fyrra helming av 20. øld. Henda gransking er savnað í ph.d.-ritgerð hansara *The Rise of Faroese Separatism, Danish-Faroese relations from 1906-1925 and the radicalization of the national- and home rule questions*, sum hann vardi í 2016 (Sølvará 2016). Við hesari granskingini tók Hans Andrias tráðin upp eftir Hans Jacob Debes, professara, sum í 1982 vardi nógv nýttu doktararitgerð sína *Nú er tann stundin... – Tjóðskaparrørsla og sjálvstýrispolitikkur til 1906* (Debes 1982). Í ritgerðini greiðir Hans Jacob frá tjóðskaparrørsluni og byrjanini til føroyskan politikk, men hann hevur eisini drúgt søguligt baksýni, har væl verður gjørt burtur úr tíðarskeiðinum, sum henda ritgerðin fevnir um. Hesi nevndu verkini um politisku søgu Føroya eru sjálvandi ikki beinleiðis viðkomandi fyri tíðina frammanundan, men tað slepst ikki undan, at eftirtíðin ávirkar fatanina av tí, sum granskað verður í.

Tá ið arbeiðið við hesi ritgerðini var um at nærkast endanum, kom bókin *Færøerne – En moderne nation fødes* hjá Charlotte Langkilde út (Langkilde 2018). Heitið á bókini minnir í nógvar mátar um tað, sum verður viðgjørt í hesi ritgerðini, men longu á baksíðutekstinum sæst, at talan er um eina heilt øðrvísi tilgongd og øðrvísi søgufatan. Langkilde vil vera við, at moderniseringin av Føroyum byrjaði, tá ið nýggi amtmaðurin, Carl Emil Dahlerup, í 1849 kom av Grundlógartingi til Føroya at standa á odda fyri einari kollvelting av samfelagnum, sum hevði „ladet vente på sig i årtier" (Langkilde 2018: baksíða).

Henda hugsan leggur seg tætt upp at eldri danskari søgufatan um, at lítið og einki var til, áðrenn grundlógin kom í 1849, men hon setur eisini føroyingar

*Charlotte Langkilde gav í 2018 út bókina* Færøerne – En moderne nation fødes. *Hon snýr seg um tíðina, tá ið Dahlerup var amtmaður í Føroyum 1849-1861.*




og danska embætismannin í eina tjóðskaparliga konfrontatiónsstøðu. Í tráð við tað ljóðar síðsti setningurin á baksíðuni soleiðis: „Forandringerne medførte dramatiske konfrontationer i takt med at gamle magtbaser stod for fald. Her fortælles historien, som ofte går imod de myter, der er fortalt gennem generationer om det danske herredømme på Færøerne.“

Við øðrum orðum vil hon gera upp við nakrar gamlar tjóðskaparligar mytur um danska yvirvaldið í Føroyum. Tann ítøkiliga mytan, hon vil gera upp við, er ein fatan av, at Dahlerup amtmaður var hástórur sum formaður í nýggja løgtinginum, og at tað elvdi til so nógva mótstøðu, at endin varð, at hann varð koyrdur frá sum amtmaður. Bókin fer tí í nógv størstan mun at snúgva seg um tær ósemjurnar, sum Dahlerup amtmaður var partur av á løgtingi árini 1852 til 1860, og niðurstøða hennara er ógvuliga eintýðug, at Dahlerup hevði rætt í øllum, og mótparturin, sum viðhvørt var føroyskur, harvið var tann seki. Talan er tí meir um eitt verjurit enn eina søguliga ritgerð um modernisering.

Móttøkan, henda bókin hevur fingið í Føroyum, vísir, at Langkilde hevur skrivað seg inn í eitt rák í tíðini, har spurnartekin verður sett við ymiskar fatanir, sum hava sín uppruna í einari tjóðskaparromantiskari søgufatan. At koma

burtur frá einari tjóðskaparligari søgufatan fram móti einari meira modernaðari søgufatan er tiltrongt, men trupulleikin er, at Langkilde og tað rákið, sum hon er partur av, ikki fer fram ímóti einari meira modernaðari fatan, men heldur velur at venda søguni á høvdið, so gamlar hetjur verða skurkar, og gamlir skurkar verða hetjur. Á tann hátt heldur henda uppgerðin seg innanfyri sama diskurs, sum tjóðskaparligt merkta søguskrivingin hevur skapt, og tá slepst ikki út um verandi fatanarkarmar; tjóðskaparlig søgufatan verður bara skift út við eina antitjóðskaparliga søgufatan.

At eitt slíkt stríð millum tjóðskaparliga og antitjóðskaparliga søgufatan fær so stórt pláss í viðgerðini av føroyskari søgu í dag, vísir betur enn so nógv annað, hvussu stórur tørvurin er á at lyfta føroyska søguskriving upp úr tjóðskaparliga diskursinum fram móti einari meira modernaðari søgufatan, har tjóðskaparhugsanin verður partur av søguni og ikki virkin lutur í søguskrivingini. Vónin er, at henda ritgerðin kann vera við til at menna eina slíka modernaða søgufatan.

### 1.2.3 Annar íblástur

Tað er ikki bara í føroyskari søguskriving, at hendingar mitt í 19. øld fáa so stórt pláss í søgufatanini, at lítið pláss verður eftir til tað, sum var frammanundan. Fyri føroyska søgu eru tað serliga endurstovnanin av Løgtinginum og avtøkan av Einahandlinum, sum verða roknaðar sum avgerandi hendingar og byrjan til modernaða tíð. Í øðrum pørtum av danska ríkinum hevur ein líknandi støða verið galdandi, har avtøkan av einaveldinum og Grundlógin hava verið roknað sum eitt ár null. Fyri danska búskaparsøgu fellur henda søgan væl saman við liberalu søgufatanina, har fólkaræði er ein treyt fyri búskaparvøkstri, tí fólkaræði er fortreyt fyri, at marknaðarkreftirnar kunnu virka frítt (Boje 2014: 237).

Í bókini *Vejen til velstand – Marked, stat og utopi* greiðir Per Boje frá danskari kapitalismu í tíðini 1730-1850, og hann vísir á, at upplýsta einaveldið sum heild tók kapitalismuna og liberala búskaparliga hugsan til sín, og „åbnede for, at større grupper fik incitament til at arbejde for øget velstand. Den handlede i stigende grad inkluderende og nedbrød de formelle og uformelle institutioner, der tidligere havde været til gavn for en meget snæver elites udbytning af det øvrige samfund.“ (Boje 2014: 270).

Henda hugsan um búskaparliga politikkin hjá kongi passar væl til høvuðshugsanina í hesi ritgerðini, og henda hugsan passar uppaftur betur, tá ið havt verður í huga, at amtmenn mundu hava sín týdningarmikla leiklut í at føra kongsins politikk út í verki. Karl Peder Pedersen sigur í verki sínum *Enevældens amtmænd – Danske amtmænds rolle og funktion i enevældens forvaltning 1660-1848*, at verkætlanin hjá einaveldiskongi at byggja statin upp var treytað av, at hann og embætismenn hansara megnaðu at stýra øllum pørtum av ríkinum, og tað megnaðu amtmenninir sum lokalir myndugleikar at gera (Pedersen 1998: 391).

Hetta sama staðfestir Yngve Flo longu á fyrstu síðu í bók síni um norska amtmansstovnin *Statens mann, fylkets mann – norsk amtmanns- og fylkesmannshistorie*, har hann sigur, at „den viktigaste institusjonen i det offentlege distriksapparatet var *amtmannsembetet*.“ (Flo 2014: 9). Í Noregi var amtmaðurin bindiliðurin millum miðfyrisitingina og lokalt vald í Noregi, og sum slíkur fekk stovnurin eina lyklastøðu í politisku og umsitingarligu søgu Noregs í fleiri hundrað ár (Flo 2014: 10).

Hesar bøkurnar báðar geva gott innlit í, hvussu amtmansstovnurin var skipaður í danska ríkinum frá byrjan, men tær leggja báðar størstan dentin á, hvussu stovnurin var skipaður, hvørjir amtmenninir vóru, og hvørjar uppgávur teir loystu. Tí fara tær ikki so langt inn á, hvørja ávirkan amtmenninir høvdu á einstøk mál, soleiðis sum gjørt verður í hesi ritgerðini. Teirra gjølliga viðgerð av amtsstovninum ger, at tær kortini eru dygt støði at byggja víðari á.

Tá ið Føroyar eru undantiknar, mundi Ísland vera tann fjarasti parturin av ríkinum. Tí var Ísland helst eisini eitt av teimum síðstu av kongsins londum, sum umsitingin í Keypmannahavn fekk rættiliga ávirkan á. Ísland og Føroyar líkjast eisini í so nógvar aðrar mátar, og tí hevur tað verið upplagt at hugt í ein útnyrðing eftir søguni har fyri at vita, um okkurt er, sum líkist tí, sum verður kannað í hesi ritgerðini. Burtur úr tí komu serliga tríggjar ritgerðir, sum hava verið gevandi. Tær eru *Monopoly trade and economic stagnation: studies in the foreign trade of Iceland 1602-1787* hjá Gisla Gunnarssoni (Gunnarsson 1983), *Mellan kung och allmoge – ämbetsmän, beslutsprocess och inflytande på 1700-talets Island* hjá Harald Gustafsson (Gustafsson 1985) og *Wool and society – Manufacturing policy, economic thought and local production in 18th-century Iceland* hjá Hrefnu Róbertsdóttir (Róbertsdóttir 2008).

Uttan at fara at gera ov nógv burtur úr íslendsku søguni kann sigast, at Gisli Gunnarsson í ritgerð síni m.a. vísti á, at tá ið kongur yvirtók íslandshandilin í 1774, so var tað ikki fyri at hjálpa neyðstøddum íslendingum, tí „it was a part of an optimistic and grandiose scheme in developing the area to the glory of the state in a true cameralist spirit.“ (Gunnarsson 1983: 138) Hetta var kollveltandi broyting í íslendska búskaparpolitikkinum, og størsta átakið vóru tær kongligu íløgurnar í eina nýggja fiskivinnu (Gustafsson 1985: 139). Í 1783 varð ein lóg kunngjørd, sum bannaði fríari arbeiðsmegi, og Gisli Gunnarsson ivast ikki í, at henda lógin kom, tí tað var eydnast bóndastættini og lokalum embætismonnum, sum óttaðust gongdina, og sum talaðu ímóti fiskvinnuni og øllum slagi av „vagrancy“, at fáa myndugleikarnar at ganga við til hana. Við hesum banninum stegðaði kapitalistiska menningin í Íslandi í mong ár (Gunnarsson 1983: 22).

Í síni ritgerð segði Harald Gustafsson, at almenna hugsanin um beinleiðis vinning av handlinum í Íslandi eftir uml. 1750 varð avloyst av einari hugsan um, hvussu meira gagn fekst burtur úr Íslandi upp á langt sikt, og einum vilja til at menna vinnulív og á tann hátt økja bæði um livistøðið í landinum og um statsins inntøkur (Gustafsson 1985: 287). Hrefna Róbertsdóttir tók henda

tráðin upp í sínari ritgerð, men hon er ikki samd við m.a. Gisla Gunnarssoni í, at almenni vinnupolitikkurin síðst í 18. øld var ein roynd at seta gongd í ta ídnaðargerðina, sum kom í 19. øld. Hon heldur, at øll átøkini at økja um framleiðsluna vóru runnin úr gamla samfelagnum og vóru „firmly rooted in the Old Society" (Róbertsdóttir 2008: 376). Hennara áskoðan er, at eingin stórvegis munur var á almennu átøkunum í 1770-80-árunum og teimum, sum staturin fór undir í 1750-árunum. Tí er hennara sjónarmið, at „the decision in the mid 18th century to incorporate Iceland into the economy of the kingdom as a whole was a more significant change than those that took place in 1780-1790, when the system was being fine-tuned." (Róbertsdóttir 2008: 173). Henda orðingin minnir ikki sørt um orðingar longur frammi í hesum innganginum, og tað er freistandi at siga, at stovnanin av føroyska amtsstovninum var týdningarmiklari broyting enn avtøkan av Einahandlinum, tí tann avtøkan var bara ein avleiðing av teirri fyrru hendingini.

Ymsa staðni í ritgerðini verður gjørt burtur úr íslendsku fiskivinnusøguni, men áðrenn íslendski tráðurin verður sleptur, er kortini vert at taka fram eina staðfesting hjá Haraldi Gustafsson. Í einum parti av ritgerð síni gjørdi hann nakrar kvantitativar kanningar av samskiftinum hjá embætismonnunum og kom fram til, at stóri vøksturin í brævasamskiftinum frá 1730 til 1780 vísti, at almennu myndugleikarnir fingu ein nógv virknari leiklut í stýringini av Íslandi. Samstundis sum hesin vøkstur var í Íslandi, var lítil og eingin vøkstur í samskiftinum Føroyum viðvíkjandi (Gustafsson 1985: 71). Tað gevur eina greiða mynd av, at áhugin hjá myndugleikunum at menna Føroyar kom nakað væl eftir, at miðfyrisitingin fekk áhuga fyri viðurskiftunum í Íslandi.

## *1.3 Bygnaðurin í ritgerðini*

Ritgerðin er í fýra høvuðspørtum við tilsamans 17 kapitlum. Í 1. parti eru inngangur og ein kapittul um ástøði og hugtøk. Í 2. parti eru fýra bakgrundskapitlar. Í 3. kapitli verður greitt frá umsitingarligu søgu Føroya fram móti einaveldinum. Greitt verður síðani frá, hvussu amtsskipanin kom í lag, og hvønn týdning hon fekk aðrastaðni í ríkinum. Hetta verður gjørt fyri at kunna greiða frá, hvussu Føroyar komu undir amtmansskipanina, og hvussu embætismannaskipanin kom at síggja út, eftir at Færø amt varð sett á stovn. Í 4. kapitli verður greitt frá søguni um Einahandilin, har dentur er lagdur á at lýsa framleiðsluna í Føroyum, og hvussu hon ávirkaði samfelagið. Í 5. kapitli verður hugt at øllum teimum royndunum, sum høvdu verið gjørdar at seta gongd á fiskivinnu í Føroyum áðrenn 1830. Felags fyri hesar báðar kapitlar er, at teir eru neyðugt grundarlag fyri at skilja tær avbjóðingar, sum amtmaðurin í royndum sínum at fáa gongd á fiskivinnu hevði at stríðast við. Síðsti kapitul í 2. parti er ein komparativur kapitul, har hugt verður at fiskivinnusøguni í Hetlandi.

Í 3. parti er øll tann empiriska viðgerðin av søguni um, hvussu amtmaðurin strembaði eftir at seta gongd á fiskivinnu. Lagt verður fyri í 7. kapitli, har greitt verður frá, hvussu fiskivinna gjørdist ein trupulleiki hjá Tillisch amtmanni í 1832, og hvussu hann vendi hesum trupulleika og gjørdi hann til ein møguleika, sum skjótt hevði við sær, at menningin av einari rættiligari fiskivinnu varð sett á dagsskrá hjá myndugleikunum. Í 8. kapitli verður greitt frá, hvussu Pløyen amtmaður helt fram við hesum royndum, eftir at hann gjørdist amtmaður í 1837, og greitt verður frá tilmæli hansara frá 26. februar 1839, sum gjørdist eitt týdningarmikið grundarlag undir menningini av fiskivinnuni. Í 9. kapitli verður hugt at vælkendu hetlandsferðini.

Í 10. kapitli verður greitt frá, at misnøgdin við Einahandilin var stór, tá ið Pløyen og hansara samstarvsfelagar komu aftur úr Hetlandi, og tað økti um áhugan hjá føroyingum at sleppa av við Einahandilin. Trýst var á Einahandlinum at fremja broytingar, og tað eydnaðist at fáa handilin at hækka prísin á fiskavørum. Í 11. kapitli verður ávíst, at henda broytingin í príspolitikkinum elvdi til, at útróður og søla av turrum fiski til Einahandilin broyttust. Tað, sum Einahandilin higartil hevði tikið ímóti av hesi vøru, hevði verið tað, sum leyp av hjá bygdarfelagsskapinum. Slíkt avlop varð lítið ávirkað av prísum, men nú gjørdist turrur fiskur til eina prísávirkiliga vøru, og tað er greitt tekin um, at útróðurin og gamla framleiðslan av turrum fiski vóru vorðin vinnulig.

Misnøgdin við Einahandilin hevði eisini við sær, at ein embætismannanevnd varð sett. Álitið hjá hesi nevndini verður greinað í 12. kapitli, og har verður eisini roynt at finna út av, hví tilmælið hjá nevndini ikki varð gjørt til veruleika, og hvør leið varð vald í staðin fyri at fylgja niðurstøðuni hjá nevndini. Í staðin fyri at avtaka Einahandilin valdi kongur at fara undir at gera nakrar fiskivinnuroyndir í Føroyum, sum skuldu vísa føroyingum á nýggjar møguleikar, og ætlanin var eisini, at nakrir føroyingar skuldu koma umborð á skipini at læra seg upp til fiskimenn. Greitt verður frá hesum royndunum í 13. kapitli. Eitt av endamálunum við kongligu fiskiroyndunum var at kveikja áhugan hjá privatum at fara undir hesa vinnuna, og í 14. kapitli verður greitt frá teimum privatu royndunum at seta gongd á fiskivinnu í Føroyum, og hvussu tað almenna royndi at stuðla hesum royndum.

Samstundis sum royndir vóru gjørdar at menna eina fiskivinnu í Føroyum, hendu stórar politiskar broytingar í Danmark, og tær ávirkaðu eisini støðuna í Føroyum. Í 15. kapitli verður greitt frá, hvat fyrstu fólkaræðisligu umboðini hugsaðu um handil og vinnu í Føroyum, tá ið málið kom til viðgerðar á Stættatingi, og greitt verður frá politisku viðgerðini av spurninginum um avtøkuna av Einahandlinum. Serligur dentur verður lagdur á at kanna, hvønn leiklut ein komandi fiskivinna hevði í hesi avgerðini.

Meðan tað gekst striltið at fáa gongd á eina fiskivinnu við skipum, soleiðis sum myndugleikarnir sóu fyri sær, tóku útróðrarmenn av, tá ið teir fingu møguleikan at avreiða ráfisk til klippfiskavirkingar, og tað var henda vinna, sum kom at verða

berandi broytingin av samfelagnum frá bóndasamfelag til fiskivinnusamfelag. Í 16. kapitli verður greitt frá tí, sum keldurnar vita at siga um menningina av vinnuligum útróðri. So hvørt sum útróðurin øktist og saman við honum áhugin fyri at virka klippfisk á landi, vórðu tey fleiri, sum sleptu traditionalistisku hugsjónunum, samstundis sum tey tóku nýggja vinnumøguleikan til sín. Ein slík kollvelting av vinnuni hendi ikki uttan mótstøðu, og í 17. kapitli verður greitt frá stríðnum millum nýtt og gamalt m.a. við støði í teimum áheitanum og uppskotum, sum vóru løgd fyri Løgtingið. Burtur úr hesum tilfarinum fæst ein greið mynd av, at vinnuligi útróðurin, longu áðrenn Einahandilin varð tikin av, hevði fingið so fast undir fótum, at tað vendist ikki aftur, sjálvt um sterkar kreftir royndu at koma honum til lívs.

## *1.4 Keldugrundarlag og háttalag*

Høvuðsevnið í hesi ritgerðini er, hvønn leiklut amtmaðurin hevði í at seta gongd á fiskivinnu í Føroyum. Tí er tað sjálvsagt, at skjalasavnið hjá amtmanninum verður høvuðskeldugrundarlagið undir ritgerðini. Skjalasavnið hjá Færø Amt liggur á Tjóðskjalasavninum, og útgangsstøðið í leitingararbeiðinum er tikið í at ganga ígjøgnum allar kopibøkurnar við brøvum, sum amtmaðurin skrivaði til ymiskar myndugleikar í Keypmannahavn frá uml. 1830 til uml. 1850. Hesi brøvini eru við forritinum NVivo skipað eftir, hvørji evni vórðu viðgjørd í teimum.

Burtur úr sorteringini í NVivo kunnu so øll skjøl, sum á onkran hátt snúgva seg um fiskivinnu ella handilsviðurskifti, takast fram og gerast meginásurin í granskingini. Hesi skjøl geva í sjálvum sær eina rættiliga góða mynd av gongdini, men tey lata eisini ymsar dyr upp fyri víðari gransking, tí út frá teimum ber til at finna fram til aðrar viðkomandi keldur, sum t.d. brøv og annað í journalunum hjá amtmanninum og samskifti í teimum kopibókunum, har brøv send innanlands eru skrivað av. Fyri at so lítil ivi sum til ber skal vera um, at alt viðkomandi tilfar hjá amtmanninum er funnið fram, sum kann finnast fram, eru journalbøkurnar hjá amtmanninum eisini gjøgnumgingnar úr einum enda í annan fyri at finna fram til viðkomandi samskifti, sum møguliga ikki sæst aftur í kopibókunum.

Leitað hevur eisini verið í skjalasøvnunum hjá hinum embætismonnunum, fútanum og sorinskrivaranum, men her er ikki talan um nakra fullfíggjaða gjøgnumgongd, tí leitað hevur bara verið á ávísum miðum, sum eru komin undan kavi í tilfarinum hjá amtmanninum.

Á Tjóðskjalasavninum liggur eisini skjalasavnið hjá Løgtinginum. Talan er um protokollir, har tey málini og t.d. atkvøðugreiðslurnar, sum hava verið fyri á tingi eru skrásett. Burtur úr tí fæst eitt yvirlit, men álit og onnur skjøl, har veruliga innihaldið í málunum er at finna, liggja fyri seg. Í hesi ritgerðini eru protokollirnar gjøgnumgingar at finna fram øll tey viðkomandi málini, og síðani hevur verið leitað eftir øllum viðkomandi skjalatilfari. Nógv av tí er at finna í

løgtingssavninum, men langt frá øll viðkomandi skjøl eru har. Nøkur av teimum, sum ikki eru í savninum, liggja í journalunum hjá amtmanninum, og onnur liggja helst í skjalasøvnum hjá avvarðandi myndugleikum í Keypmannahavn. Tað hevur fyri hesa ritgerðina havt við sær, at brøv frá nøkrum av teimum fyrstu útróðrarmonnunum, sum róku útróðurin vinnuliga, ikki eru funnin, men tað merkir eisini, at tað er ov tíðarkrevjandi og torført at arbeiða við skjalatilfarinum hjá Løgtinginum, tá ið havt verður í huga, hvussu grundleggjandi hesin stovnur er fyri føroyska søga. Tí eigur ein verkætlan, har alt viðkomandi tilfar verður funnið og skipað av nýggjum og møguliga skrivað av, at fáa høga raðfesting.

Ein týðandi avmarking í hesi ritgerðini er, at eingin skipað og gjøgnumførd leiting er gjørd á Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn. Eg havi kortini verið einar tvær ferðir á vitjan har og leitað í tilfari, sum tóktist viðkomandi í einari leiting á Daisy-leitiskipanini. Har varð serliga roynt at leita eftir viðgerð av handilstakstunum fyri at finna fram til ein møguligan príspolitikk og grundgevingar fyri honum, og roynt hevur eisini verið at funnið fram til tilfar frá teimum skiftandi nevndunum, sum hava arbeitt við spurninginum um fríhandil í Føroyum. Rolf Guttesen hevur eisini verið so beinasamur at leita fyri meg á Ríkisskjalasavninum, tá ið serliga stórur saknur hevur verið á onkrum ávísum keldutilfari.

At enda eigur at verða nevnt, at eg havi verið við í einum granskingarbólki, sum hevur granskað ymiskar tættir av søguni um moderniseringina av Føroyum í 19. øld. Í sambandi við verkætlanina „Det færøske samfunds transformation i 1800-tallet“ hava vit savnað saman hópin av tilfari og framleitt ymiskt nýtt tilfar, sum sjálvandi eisini verður nýtt í hesi ritgerðini.

### 1.4.1 Kolonisøgulig metoda

At ritgerðin í so stóran mun byggir á tilfar frá amtmonnunum, gevur nakrar serligar keldukritiskar avbjóðingar, tí amtmenninir vóru mentanarliga uppaldir í einum øðrvísi samfelag enn tí, teir vóru settir at stýra. Teirra uppfatan av føroyska samfelagnum var tí í stóran mun bygd á eina samanbering við tað samfelagið, teir komu frá. Tí er tann myndin av føroyska samfelagnum, sum er at finna í keldutilfarinum, merkt av at vera embætismansins konstruktión av fremmanda samfelagnum.

Meðan nógv skjalatilfar er at finna hjá donsku embætismonnunum, er sera lítið tilfar tøkt, sum kann geva eina greiða mynd av, hvussu føroyingar sjálvir fataðu føroyska samfelagið í tíðini, sum er til umrøðu í hesari ritgerðini. Tað ger tað sjálvandi torført at skapa eina rættvísandi mynd av tíðini, og tá ið føroyingar koma til orðanna, er tað oftast ígjøgnum embætismannin og harvið eisini ígjøgnum hansara uppfatan av samfelagnum.

Hetta er ein vælkendur trupulleiki í hjálandasøgu, og fleiri postkolonialistisk boð hava verið um, hvør rætti háttalagsligi mátin er at vinna á hesi avbjóðing. Ein av teimum er Niels Brimnes, sum í greinini „Dansk kolonihistorie mellem historievidenskab og antropologi – et forslag til metode“ (Brimnes 1992) skeyt

upp at gera eina diskursgreining av, hvussu embætismenn umrøddu og lýstu tað fremmanda samfelagið, teir skuldu stjórna, og eina greining av tí, teir ítøkiliga gjørdu í fremmanda samfelagnum.

Á tann hátt ber til at finna fram til eitt „beskrivelsesmønster" og eitt „handlingsmønster", sum saman skapa eina rammu fyri, hvat embætismaðurin fær sett orð á og harvið eisini, hvat ber til hjá honum at gera. Við einari slíkari greining fæst ein greiðari mynd av uppfatini hjá embætismanninum av fremmanda samfelagnum, sum aftur kann brúkast í keldukritisku viðgerðini av tí, sum embætismaðurin sigur um og ger í fremmanda samfelagnum (Brimnes 1992: 112).

Munurin á føroyska samfelagnum og tí samfelagnum, embætismenninir komu frá, var neyvan líka stórur, sum munurin á danska samfelagnum og hjálondunum í tropunum, sum hetta háttalagið var hugsað til, og til hesa ritgerðini er heldur eingin nágreinilig greining gjørd eftir hesum háttalagnum, men kortini hevur hugsanarhátturin hjá Brimnes viðhvørt verið hentur at havt í kelduviðgerðini, serliga tá ið saknur hevur verið á onkrari føroyskari rødd.

Trupulleikin við, at keldutilfarið fyri tað mesta stavar frá skjalasøvnunum hjá embætismonnunum, er eisini í stóran mun avmarkaður av, at tað er júst leikluturin hjá amtmonnunum, sum er til viðgerðar í ritgerðini. Til tað evnið er hetta skjalatilfarið tað best hugsandi keldugrundarlagið, men tá ið hugt verður at, hvussu virksemið hjá amtmonnunum ávirkaði samfelagið, er saknur í keldum frá teimum, sum vórðu ávirkað, tí tað er ikki vist, at fatanin hjá teimum av avgerðum amtmansins var tann sama sum tann, sum kemur til sjóndar í tøka skjalatilfarinum.

Harumframt er stórur saknur á keldum, sum kunnu siga nakað um, hvørji tey vóru, sum tóku av nýggju møguleikunum, ið fiskivinnan gav, og hvussu teirra virksemi var við til at fyrireika tey at taka lut í tí heiminum, sum lá opin, tá ið Einahandilin endiliga varð avtikin. Har keldutilfarið er so avmarkað, ber illa til at gera annað enn at fylgja keldunum, so langt sum tær røkka, og so royna at fylla holini, sum eftir standa, við vælgrundaðum metingum.

### 1.4.2 Komparativ kanning

At samanbera granskingarevnið í hesi ritgerðini við líknandi søgu í øðrum londum er ein upplagdur møguleiki at lata upp fyri nýggjum perspektivum, sum kanska ikki eru so løtt at finna í sjálvum keldugrundarlagnum. Í sambandi við ritgerðina hevur verið leitað eftir hóskandi samanberingum í Danmark og Noregi, men av tí, at serliga landafrøðiligu umstøðurnar vóru so nógv øðrvísi enn í Føroyum, varð henda royndin slept. Eftir var at samanbera við Ísland og Hetland.

Sjálvt um millum lítið og einki samskifti var millum Ísland og Føroyar fyrr enn síðsta triðingin av 19. øld, so vóru londini partur av sama ríki í fleiri hundrað ár, og støðan hjá londunum í ríkinum var so at siga tann sama heilt fram til 1843. Tí eru góðir møguleikar at samanbera tær royndirnar, sum almennir myndugleikar gjørdu at seta gongd á eina modernisering í Íslandi við tað, sum verður umrøtt

í hesi ritgerðini. Føroyar og Ísland høvdu í mong ár felags amtmann, og tá ið gongd skuldi setast á eina fiskivinnu í Føroyum, var Ísland viðhvørt nýtt sum fyrimynd. Harumframt var avtøkan av Einahandlinum í Føroyum eisini bundin at viðgerðini av handlinum í Íslandi, og í teoretiska grundarlagnum, sum komið verður inn á í komandi kapitli, fyllir eitt ástøði hjá Thráinn Eggertsson um gongdina í Íslandi nógv. Alt tað ger, at tað fellur meira natúrligt at draga Ísland inn í sjálva viðgerðina, har tað er viðkomandi, enn at gera eina slíka samanbering í einum parti fyri seg.

Viðvíkjandi Hetlandi er støðan øðrvísi, tí hóast Hetland á so mangan hátt kundi samanberast við Føroyar, so hoyrdi Hetland til bretska kongsríkið, og tað gav landinum eitt heilt øðrvísi statsrættarligt grundarlag. Aðrir samfelagsstrukturar, m.a. ognarviðurskiftini, vóru eisini øðrvísi, og tað gjørdi, at gongdin í Hetlandi gjørdist øðvísi enn gongdin í Føroyum, og tað er áhugavert, tá ið havt verður í huga, hvussu stóran týdning Hetland hevði sum fyrimynd, tá ið talan var um at brúka fiskivinnuna til at flyta samfelagið inn í eina nýggja tíð.

Longu síðst í 18. øld sóu embætismenn, at fólkatalið í Hetlandi var á leið fýra ferðir so stórt, sum tað var í Føroyum, sjálvt um veðurlag og støðd á landinum var á leið tann sama. Spurningurin gjørdist tí, hvussu Føroyar kundu herma eftir hetlendingum. Í 1839 varð kanningarferð gjørd, og hon fekk á mangan hátt týdning fyri menningina av eini fiskivinnu í Føroyum. Eingin visti tá, at hetlendska fiskivinnan júst tá var komin á ein aldutopp, og at vøkstur í bæði fólkatali og búskapi skjótt fór at verða skift út við stagnatión. Í 6. kapitli verður greitt frá hesari søguni, og tann søgan gevur ein frálíkan møguleika at síggja granskingarevnið í hesi ritgerðini úr einum øðrvísi perspektivi. Hetta er serliga áhugavert í mun til ástøðiliga grundarlagið, har føroyska og hetlendska dømið enda í hvør sínari síðu í høvuðsmótsetningsparinum í ástøðinum hjá Acemoglu et.al, sum greitt verður frá í komandi kapitli.

# 2. kapittul
# *Ástøði og hugtøk*

Broytingin frá einum støðugum bóndasamfelagi til eitt alsamt vaksandi ídnaðarsamfelag er eitt av teimum mest viðgjørdu evnunum í søgufrøðini. Tí er eisini eitt ótal av ástøðiligum hugsanum um henda spurning, sum kundu verið nýttar sum ástøðiligt grundarlag til hesa ritgerðina. Eg havi kortini valt at halda meg til bókina *Why nations fail* hjá Daron Acemoglu og James A. Robinson (Acemoglu og Robinson 2012), tí teirra hugsan samsvarar væl við hugsanina aftan fyri spurningarnar í innganginum, og bókin hevur tí givið týðandi íblástur til at skilja viðgjørda evnið úr einum nýggjum sjónarhorni. Ein annar avgerandi íblástur er greinin hjá íslendska búskaparfrøðinginum Thráinn Eggertsson frá 1996 (Eggertsson 1996), har hann roynir at svara spurninginum um, hví tað tók so langa tíð at menna eina fiskivinnu í Íslandi. Svarið var, at íslendska samfelagið var endað í einari javnvágsfellu, har áhugamálini hjá sterku íslendsku bóndastættini og einum veikum stati fullu saman og steðgaðu allari menning. Hetta minnir á mangan hátt um støðuna í Føroyum, og tí verður eisini neyðugt at útgreina hesar báðar tættirnar, bóndasamfelagið og statin, í hesum partinum.

## *2.1 At finna røttu rásina*

Sjálvt um Daron Acemoglu og James A. Robinson eru búskaparfrøðingar, so komu teir í bók síni *Why nations fail* fram til, at tað er ikki nóg mikið at kanna búskaparlig hagtøl og aðrar búskaparligar fortreytir fyri at skilja, hvussu tað ber til, at onkrar tjóðir gerast ríkar, meðan aðrar gerast fátækar. Frágreiðingin liggur longri afturi í tíð í politiskum og stovnsligum broytingum.

Í stuttum er teirra høvuðshugsan, at

> Political and economic institutions, which are ultimately the choice of society, can be inclusive and encourage economic growth. Or they can be extractive and become impediments to economic growth. Nations fail when they have extractive economic institutions, supported by extractive political institutions that impede and even block economic growth. But this means that the choice of institutions – that is, the politics of institutions – is central to our quest for understanding the reasons for the success and failure of nations. (Acemoglu og Robinson 2012: 83)

Í hesi ritgerðini er Færø amt tann stovnurin, sum verður kannaður, og spurningurin er, um og í hvussu stóran mun hesin stovnurin hevði týdning fyri at

gera Føroyar til eitt modernað kapitalistiskt samfelag. Júst hetta skiftið frá landbúnaðarsamfelag til eitt meira modernað samfelag fyllir eisini nógv í teimum dømunum, sum Acemoglu tekur fram um avgerandi skifti í søguni, sum hann nevnir „critical junctures“. Sambært honum eru tað avgerðir, ið verða tiknar í slíkum løtum, sum avgera, hvønn veg menningin í ymiskum londum fer.

Ídnaðarkollveltingin gjørdist eitt avgerandi skifti í so at siga øllum londum, tí hon gav ein møguleika fyri at skifta ekstraktivu feudalskipanina út við meira inklusivar politiskar og búskaparligar skipanir. Tey samfeløgini, sum loyvdu og eggjaðu íbúgvum til at gera íløgur í nýggja tøkni, vuksu skjótt, men nógva staðni miseydnaðist tað, tí ekstraktivir politiskir og búskaparligir stovnar forðaðu fyri tí (Acemoglu og Robinson 2012: 243).

Ídnaðarkollveltingin byrjaði í Onglandi, tí at bretski staturin tíðliga tók ymisk inklusiv stig, sum gjørdu hana møguliga. Eitt tað fyrsta var, at allir íbúgvar vórðu javnstillaðir í bretskari lóg, tilvildarlig skattaumsiting varð nærum útruddað, og bretski staturin virkaði íðin fyri at menna handilsvirksemi og heimaídnað. Samstundis varð skil fingið á ognarrættinum, og gongd varð sett á at útbyggja samferðslukervið við vegum og kanalum og seinni eisini jarnbreytum. Á henda hátt gav staturin fólki møguleikan og eggjaði teimum til at royna nýggjar inntøkumøguleikar. Soleiðis gjørdist ídnaðarkollveltingin møgulig (Acemoglu og Robinson 2012: 103).

Hvussu onnur lond svaraðu upp á henda møguleikan ella hesa hóttanina, sum spreiddist úr Bretlandi, var avgerandi fyri, um londini vórðu verandi í fátækadømi, ella um tey fingu lut í einum áhaldandi búskaparvøkstri. Svarið var í stóran mun avgjørt av teimum stovnum, sum vóru í landinum, og søguligu gongdini (Acemoglu og Robinson 2012: 105), og tað vil í flestu førum siga, hvussu sterk tann feudala skipanin var.

Feudala samfelagið var ikki miðsavnað, tí miðsavnandi staturin var tránaður burtur, sjálvt um sterkir kongar høvdu roynt at umskipa landbúnaðin. Eitt grundarlag undir feudalum stovnum var tvungin arbeiðsmegi, og bara tað ófrælsið ger, at feudalir stovnar mugu roknast fyri at vera ekstraktivir, og harvið vóru teir grundarlagið undir tí langa tíðarskeiðinum í evropeiskari miðøld, har lítil og eingin búskaparligur vøkstur var (Acemoglu og Robinson 2012: 176).

Aðalstættin og aðrar siðbundnar elitur, sum fingu meginpartin av síni inntøku úr landbúnaðinum, stýrdu flestu evropeisku londunum, og støða teirra var við tíðini styrkt við einarætti av ymiskum slag og forðingum fyri, at onnur kundu sleppa framat. Tá ið ídnaður og aðrar vinnugreinir vuksu saman við býum, tóku tey tilfeingi frá landbúnaðinum. Inntøkan hjá elituni minkaði, og bøndur noyddust at gjalda sínum arbeiðsfólki meira í løn. Tí vóru gomlu eliturnar „the clear economic losers from industrialization“, samstundis sum ein vaksandi miðal- og arbeiðarastætt gjørdist ein hóttan móti politiska valdinum hjá elituni. Gomlu eliturnar fóru tí eisini at arbeiða hart ímóti ídnaðarkollveltingini (Acemoglu og Robinson 2012: 85).




*Bókin* Why Nations fail *hjá Daren Acemoglu og James Robinson.*

Franska kollveltingin og seinni eisini Napoleon vístu vegin fram fyri evropeisku londini við at avtaka einaveldið, feudalu serrættindini og onnur búskaparlig serrættindi og við at innføra reglur um, at øll vóru líka fyri lógini. Á tann hátt fyrireikaði franska kollveltingin Evropa til at stovna inklusivar stovnar og við grundarlagi í teimum skapa búskaparligan vøkstur (Acemoglu og Robinson 2012: 291). Nøkur lond tóku við hesum møguleikanum og gjørdust før fyri at taka við teimum fyrimununum, sum komu við m.a. tøkniligari menning. Onnur lond, sum t.d. Eysturríki-Ungarn undir Franz 1. keisara, andøvdu ímóti. Franz keisari vildi varðveita samfelagið, soleiðis sum tað hevði verið, og tí setti hann forboð fyri at byggja virkir og jarnbreytir. Hansara fremsta endamál var at varðveita ekstraktivu stovnarnar, sum hann hevði tamarhald á, og at verja fyrimunirnar hjá siðbundnu elituni, sum stuðlaði honum (Acemoglu og Robinson 2012: 226).

Felags fyri tær politisku broytingarnar, sum endaðu við meira inklusivum stovnum, var, at tað eisini eydnaðist teimum at geva einum størri parti av fólkinum lut í valdinum. Pluralisma er soleiðis ein týðandi fortreyt fyri inklusivum stovnum (Acemoglu og Robinson 2012: 458), men aftur her merkir tað, at teir bólkarnir, sum høvdu alt vald frammanundan, noyddust at lata vald frá sær. Inklusivir búskaparligir stovnar eru slíkir, sum loyva og eggja meginpartinum av fólkinum til at brúka síni evni so væl, sum til ber, og sum loyva fólki at velja ta leið, sum tey

ynskja sær. Slíkir stovnar byggja á tryggan ognarrætt, javnrættindi og almennar tænastur, sum geva fólki møguleika at samstarva og samskifta á jøvnum støði, og teir tryggja eisini, at nýggj vinna kann taka seg upp, og at fólk frítt kunnu velja sína yrkisleið (Acemoglu og Robinson 2012: 74). Inklusivir búskaparligir stovnar slóða eisini fyri tøknifrøði og útbúgving, sum eru tvær aðrar týdningarmiklar fortreytir fyri framgongd. Áhaldandi búskaparvøkstur er næstan altíð treytaður av tøkniligari framgongd, sum ger, at fólk, jørð og kapitalur kunnu framleiða meira (Acemoglu og Robinson 2012: 77).

Sjálvt um tøknilig menning førdi til stóran vøkstur, so var mótstøðan ímóti hesum broytingum stór. Henda mótstøðan var ikki bygd á stuttskygni, tí mótstøðan móti búskaparvøkstri hevur sín egna greiða logikk. Búskaparvøkstur og tøknilig broyting hava við sær, at tað gamla má brótast niður fyri at geva pláss fyri tí nýggja. Hesa gongd hevur búskaparfrøðingurin Joseph Schumpeter nevnt „Creative destruction", og óttin fyri hesari niðurbróting av tí verandi skapar eina sterka andstøðu ímóti inklusivum stovnum, bæði politiskum og búskaparligum (Acemoglu og Robinson 2012: 84)[1]. Óttin fyri kreativu niðurbrótingini er høvuðsorsøkin til, at lítil vøkstur var í livistøðinum hjá fólki í tíðini millum steinøldina og ídnaðarkollveltingina (Acemoglu og Robinson 2012: 183).

Ein fortreyt fyri at skapa inklusivar stovnar var ein statur við sterkari miðfyrisiting, sum kundi tryggja lóg og landaskil og t.d. ognarrættin (Acemoglu og Robinson 2012: 216). Vantandi miðsavnan av valdinum hevði við sær, at lóg og landaskil ikki var á øllum økjum, og samstundis vóru kreftir á hesum økjum, sum kundu steðga broytingum, tí óttin fyri, hvussu hesir bólkar fóru at reagera, fekk „would-be centralizers" til at lata vera við at fremja tiltrongd átøk. Tí er politisk miðsavnan ikki sannlík, fyrr enn ein bólkur av fólki er so nógv sterkari enn hinir, at tað ber til at byggja upp ein stat. Einasti máti at byggja inklusivar stovnar er við at noyða elituna til at góðtaka meira pluralistiskar stovnar (Acemoglu og Robinson 2012: 87).

Tað er ofta neyðugt við nýggjum kustum, tá ið so grundleggjandi broytingar skulu gerast, og Acemoglu ásannaði, at „new people with new ideas were crucial to this transformation." (Acemoglu og Robinson 2012: 205). Miðsavnaða statsvaldið skuldi umframt at tryggja lóg og landaskil og ognarrættin eisini „encourage economic activity when necessary by investing in public services." (Acemoglu og Robinson 2012: 243).

Mótstøðan móti slíkari miðsavnan var tann sama sum mótstøðan móti tøkniligu og búskaparligu menningini, tí tær stættir og teir bólkar, sum høvdu valdið í einari lítið miðsavnaðari skipan, skuldu lata vald frá sær í sambandi við hesar broytingar. Tí høvdu samfeløg við lítlari miðsavnan torført við at taka við fyrimununum, sum stóðust av ídnaðarkollveltingini (Acemoglu og Robinson 2012: 244).

1 Ástøðið hjá Schumpeter er áður nýtt í gransking av føroyskari búskaparsøgu, sí Johansen 1997: 43, har dentur er lagdur á tøkniligar innovatiónir.

Úrslitið var eisini, at fleiri lond ikki megnaðu at fáa fyrimunir av avgerandi skiftinum, sum ídnaðarkollveltingin var, tí tey vóru stýrd av einaveldi og ekstraktivum stovnum, ella tí tey høvdu eina veika politiska miðsavnan (Acemoglu og Robinson 2012: 218). Ójavnin í heiminum í dag stavar frá hesum skiftinum (Acemoglu og Robinson 2012: 271), tí ríku londini í dag eru tey, sum tóku við ídnaðargerðini og tøkniligu broytingunum í 19. øld, og tey fátøku londini eru tey, sum ikki gjørdu tað (Acemoglu og Robinson 2012: 301).

Acemoglu tekur saman um og sigur, at

> Central to our theory is the link between inclusive economic and political institutions and prosperity. Inclusive economic institutions that enforce property rigths, create a level playing field, and encourage investments in new technologies and skills are more conductive to economic growth than extractive economic institutions that are structured to extract resources from many by the few and that fail to protect property rights or provide incentives for economic activity. Inclusive economic institutions are in turn supported by, and support, inclusive political institutions, that is, those that distribute political power widely in a pluralistic manner and are able to achieve some amount of political centralization so as to establish law and order, the foundations of secure property rights, and an inclusive market economy. (Acemoglu og Robinson 2012: 430)

Hetta passar væl við mína fatan av søguligu gongdini í Føroyum, har ein amtmansstovnur við sæti í Tórshavn, gjørdist byrjanin upp á eina miðsavnaða politiska fyrisiting, sum kundi taka aðrar avgerðir enn tær, sum tæntu gomlu bóndaelituni og keypmonnunum hjá Einahandlinum. Hesar avgerðir førkaðu spakuliga føroyska samfelagið burtur frá gamla bóndasamfelagnum og yvir í eitt meira modernað samfelag við áhaldandi vøkstri.

## *2.2 Javnvágsfellan*

Ein serlig avbjóðing hjá statsvaldinum í Føroyum var, at tað lá í einum øðrum landi, tí flest allar týðandi avgerðir skuldu takast í Keypmannahavn. Fjarstøðan millum Føroyar og Keypmannahavn og helst eisini vantandi áhugi gjørdu, at statsvaldið í Føroyum leingi var veikt. Í Íslandi var støðan nakað lík, og íslendski búskaparfrøðingurin Thráinn Eggertsson hevur í grein spurt, hví Ísland í nærum 1000 ár var eitt sub-arktiskt bóndasamfelag, sjálvt um nakrir av heimsins bestu fiskabankum vóru kring landið.

Hansara svar upp á spurningin var, at Ísland heilt fram til 19. øld var fangað í einari javnvágsfellu, ella „equilibrium trap", sum var samansett av einum innara og einum uttara parti. Innari parturin vóru áhugamálini hjá landánarum og bóndum, sum óttaðust fyri, at ein fiskivinna fór at hava við sær, at arbeiðslønin hjá húskallum og øðrum vaks. Uttari parturin var, at danska statsvaldið var veikt

og langt burturi, og tí legði staturin seg eftir at byrgja landið inni og verja tað móti útlendskari ávirkan. Eggertsson heldur, at hesin politikkurin var ávirkaður av hendingunum í 15. og 16. øld, tá ið staturin í veruleikanum misti alla ávirkan, meðan bretar og týskarar stríddust um, hvør skuldi hava vinningin av íslendska fiskinum (Eggertsson 1996: 21).

Hetta ástøðið samsvarar væl við hugsanirnar hjá Acemoglu, sum greitt er frá omanfyri, og tað ger tað ikki verri, at Eggertsson eisini arbeiðir við hugtakinum „imperfect institutions", sum upp á mangar mátar minnir um ekstraktivu stovnarnar hjá Acemoglu. Stovnarnir í Íslandi loyvdu bara havfiskiskapi ein part av árinum, og hann varð avmarkaður til bøndur (Eggertsson 1996: 1). Hetta varð gjørt við lógum, sum áløgdu øllum vaksnum íbúgvum at búgva á gørðunum og virka sum annaðhvørt bóndi ella tænastufólk (Eggertsson 1996: 4).

Hjá danska statinum var Ísland ein fjarur partur av ríkinum, og tað gjørdi, at tað kostaði meira hjá statinum at útinna myndugleika sín har, enn hann kundi fáa innaftur í vinningi (Eggertsson 1996: 6). Tí var stjórnarvaldið ikki so sterkt til staðar í landinum, og íslendska elitan fekk tí stórt sjálvstýri (Eggertsson 1996: 8). Veika stjórnarvaldið gjørdi eisini, at tað ráddi um at verja landið frá útlendskari ávirkan, og stóru fiskiflotarnir frá fremmandum londum mintu áhaldandi á henda tørv (Eggertsson 1996: 10).

Stjórnin visti, at stórur vinningur kundi fáast burtur úr fiskivinnuni, men hon gjørdi ikki stórvegis við at royna at modernisera samfelagið. Onkuntíð vóru royndir gjørdar, men tær avmarkaðu seg til at fáa bøndurnar at bøta um bátar og reiðskap og leggja størri dent á fiskiskapin, og talan var tí ikki um grundleggjandi strukturellar broytingar (Eggertsson 1996: 10). Størri broytingar hættaði stjórnin sær ikki rættiliga undir, tí íslendska elitan var harðliga ímóti broytingum, og veika statsvaldið í landinum gjørdi, at stjórnin í Keypmannahavn hevði brúk fyri at samstarva við elituna (Eggertsson 1996: 11).

Prógv eru fyri, at bóndastættin tíðliga í tíðini sá ein vanda í bøttari fiskivinnu, og longu í 1578 og 1586 bannaði Altingið línufiskiskapi um veturin, sum var háárstíð fyri fiskiskap. Í einum brævi dagfest í 1581 kærdu framstandandi bøndur um, at línufiskiskapur var vorðin vanligur í einum ávísum øki, og grundgeving teirra var, at hesin fiskiskapur fekk tænastufólk at velja fiskivinnuna, og tað hevði við sær, at ov lítil arbeiðsmegi varð eftir til garðarnar (Eggertsson 1996: 13).

Tí hendi niðurbrótingin av gomlu skipanini og menningin av fiskivinnuni ikki, fyrr enn myndugleikarnir broyttu politikk og loyvdu fríum handli. Kongur setti bæði í 1770 og í 1785 nevndir at kanna búskaparligu støðuna í Íslandi, og báðar nevndirnar løgdu dent á fiskivinnuna. Burtur úr hesum arbeiðinum komu nógvar av teimum nýskipanunum, sum vórðu settar í verk í endanum á 18. øld (Eggertsson 1996: 18). Í 1770-árunum vóru fleiri fiskiskip smíðað væl stuðlað av kongi, og tá ið kongur yvirtók einahandilin í 1776, yvirtók hann eisini fiskiskipaflotan. Samstundis var prísurin á fiski tvífaldaður, og hetta var alt ein roynd at innføra nýggja tøkni til íslendska búskapin. Íslendska elitan tók

ikki undir við hesum royndum, og heldur enn at stuðla teimum royndi hon at fáa sett í verk skipan við passum, sum fólk skuldu hava, um tey ætlaðu sær at fara úr einum landsparti í ein annan (Eggertsson 1996: 18).

Tá ið stjórnin, m.a. orsakað av versnandi liviumstøðum í Íslandi fór undir henda nýggja politikkin, hvarv statsins partur av javnvágsfelluni, og menningin av modernaða samfelagnum kundi byrja (Eggertsson 1996: 17). Henda broytingin gjørdist eisini meira átroðkandi við Skaftáreldunum, sum fóru at gera um seg í 1783. Tann landafrøðiliga vanlukkan gjørdi tað púra greitt, at Ísland stóð við eitt avgerandi vegamót, og samstundis legði eldgosið so nógv í oyði, at tað kom at virka sum tann kreativa niðurbrótingin, sum tørvur hevði verið á fyri at koma burtur úr javnvágsfelluni, sjálvt um tað moralskt er torført at nevna eitt slíkt vanlukkuligt eldgos kreativt.

## *2.3 Staturin og menningin av honum*

Fyri umleið 500 árum síðani, tá ið modernað tíð avloysti miðøldina, fór heimsbúskapurin inn í eitt langt tíðarskeið við áhaldandi vøkstri, samstundis sum statsvaldið varð styrkt og miðsavnaðist í fleiri evropeiskum londum. Hvat var orsøk, og hvat var avleiðing, skal ikki viðgerast her, men hesi bæði, búskaparligur vøkstur og økt miðsavnað statsvald, hava treytað hvørt annað langt upp í søguna, og í hvussu er upp til tað tíðarskeiðið, sum er til viðgerðar í ritgerðini.

Sterki staturin hevði brúk fyri einari væl útbygdari umsiting við kongligum embætismonnum, og so hvørt, sum staturin styrktist, vaks embætisverkið eisini, og embætismenn fingu størri og størri vald í mun til tær gomlu feudalu eliturnar. Tann gongdin endaði við, at fleiri kongar í 17. øld megnaðu at taka vald frá aðalsstættini og fingu fullkomið einaveldi.

Styrkti staturin fór í 17. øld at reka ein búskaparpolitikk, sum seinni varð nevndur merkantilisma. Undir merkantilismuni búði ein áskoðan um, at til bar at skapa búskaparligan vøkstur, og at staturin kundi vera við til at skapa henda vøkstur. Vøksturin var treytaður av, at lond innfluttu minni, enn tey útfluttu, tí evropeisku londini vóru meira kappingarneytar enn samstarvsfelagar, og tí varð málið hjá statinum at virðisøkja rávørurnar og tryggja, at staturin var so sjálvforsýnandi, sum til bar. Kappast varð um siglingina á heimshøvunum og um handil við fjarskotin lond, og koloniseringarnar vóru eisini partur av hesum politikkinum (Boje 2014: 61–62).

Tørvurin á at vera sjálvforsýnandi skapti eina skipan í danska ríkinum, har vørur vórðu fluttar millum ymisku londini í ríkinum. Sum vit fara at síggja í fjórða kapitli, hevði hetta stóra ávirkan á føroyskan búskap og ikki minst á framleiðsluna í landinum, har allur denturin við tíðini varð lagdur á at binda hosur til útflutnings. Tað tykist hava havt tað paradoksala við sær, at økt statslig ávirkan í Føroyum styrkti um feudaltkenda bóndasamfelagið. Spurningurin er tí, um tað

ikki var framvøksturin av statinum, í Føroyum gjørt ítøkiligt við, at Islandske Kompagni yvirtók handilin í 1619, sum upprunaliga skapti javnvágsfelluna í merkantila tíðarskeiðinum í 17. øld.

So hvørt sum miðfyrisitingin hjá kongi vaks, varð hon skipað í ymisk kømur og kollegiir, og í Týsklandi varð læran um, hvussu kongsins kassar skuldu umsitast, ment til eina vísindaliga lærugrein við heitinum Kameralwissenschaft. Eitt av endamálunum við hesi læruni var at vísa á møguleikar hjá statinum at menna ríkisins vinnulív, og tí vóru bæði tøkni, umsiting, búskapur og fígging partur av lærugreinini (Thorsteinsson 1990: 54). Í 18. øld varð tað vanlig hugsan, at endamálið við at savnast saman í statir var at økja um almennu vælferðina, og til hetta endamál hóskaði kameralistiska hugsanin seg væl, tí vælferðin hjá fólki og vælferðin hjá statinum vóru tvær síður av somu søk. Kameralisman legði dent á eina miðsavnaða almenna umsiting, sum var rationelt bygd við greiðum arbeiðsbýti millum ymisku kømurini og kollegiini, sum umsótu hvør síni málsøki (Gustafsson 1985: 18).

Henda kameralistiska miðfyrisitingin var væl fyri at taka við nýggjum hugsanum í tíðini, og tær vóru fleiri í upplýsingartíðini. Ein av teimum var fysiokratiska hugsanin um, at til bar at fáa serliga landbúnaðin at kasta meira av sær við skilagóðum tiltøkum. Henda hugsan samsvarar væl við, at kongur í 1755 vildi hava kjak í lag um øll viðurskifti, sum kundu økja um virðini í landinum (Boje 2014: 128). Seinni fekk borgaraskapurin hug til at taka lut í hesum virksemi, og fyrsta av mongum patriotiskum feløgum, Det kongelige Danske Landhusholdningsselskab, varð stovnað í 1769 (Engelhardt 2006: 36).

Hesi rák fingu eisini ávirkan í Føroyum, men nýggja tíðin merktist ikki av álvara, fyrr enn eitt nýtt rák hevði gjørt vart við seg í miðfyrisitingini. Tað var liberalistiska hugsanin, sum førdi til politiskar og búskaparligar kollveltingar síðstu árini av 18. øld og væl upp í 19. øld. Liberalur búskaparpolitikkur fór síðstu áratíggjuni av 18. øld at avloysa tann gamla merkantilistiska politikkin. Størri skilnaður kom í millum tað almenna og privat vinnulív, staturin stuðlaði vinnuátøkum og skipaði fyri at taka burtur forðingar fyri fríari kapping. Hesi átøk gjørdu, at institutionellu rammurnar vóru til staðar og grundarlag var fyri at gera stórar privatar íløgur undir seineinaveldinum. Tað gjørdi, at tá ið politiska liberalisman at enda tók við, og einaveldið varð avmarkað til at vera konstitutionelt mitt í 19. øld, kundi fólkaræðið yvirtaka ein marknaðarbúskap, sum stóð í vøkstri. Einaveldið hevði longu avtikið fleiri av teimum siðbundnu reglunum, sum forðaðu búskaparvøkstri, og hevði havt ein avgerandi leiklut í at modernisera vinnulívið (Boje 2014: 269).

Venda vit nú aftur til átøðið hjá Eggertsson um javnvágsfelluna, nýtir hon bara eitt sterkt bóndasamfelag og ein veikan stat sum frágreiðing um forðingar fyri, at Ísland fekk ein búskap bygdan á fiskivinnuna. Tann frágreiðingin kann brúkast fram móti endanum á 18. øld, men tá ið komið verður inn í 1780-árini, ber ikki longur til at siga, at staturin var veikur, og tí kann tann frágreiðingin

illa standa einsamøll sum orsøk til, at tað gekk so seint at fremja broytingar í Føroyum. Tørvur er á at leggja afturat ástøðinum um javnvágsfelluna, um hon skal brúkast til at skilja søguligu gongdina í 19. øld. Tað, sum skal leggjast afturat, er, hvør hugsanin gjørdist um ein útjaðara sum Føroyar í nýggju tíðini, sum var merkt av liberalistiskari hugsan bæði búskaparliga og politiskt.

Upplýsingartíðin var merkt av einari hugsan um framburð á øllum økjum, og í søgufatan sæst henda hugsan aftur í historistisku fatanini av, at einasti máti at skilja náttúruna í nøkrum í hesum heimi var at skilja søguligu menningina av hvørjari einstakari eind. Henda hugsanin um menning og fatanin av, at menningin tók eina ávísa tíð, var avgerandi fyri historistisku søgufatanina (Chakrabarty 2008: 23). Frá teirri fatanini var stutt til eina fatan av, at samfeløg og fólkasløg vóru á ymiskum menningarstigi á einum stiga við evropeisku londunum sum teimum mest siviliseraðu.

Evropeisku londini vóru komin so langt, tí tey høvdu verið ígjøgnum eina modernisering, sum hevði skapt ein kapitalistiskan búskap og liberalistiskar politiskar stovnar. 19. øld er í stóran mun merkt av, at samstundis sum evropeisku londini mentust við miklari ferð, hættaðu tey sær ikki at flyta ágóðar sum fólkaræði og frían handilsmarknað til hjálond síni, tí fólkið í teimum londunum var ikki nóg siviliserað ella nóg høgt uppi á menningarstiganum til at kunna fáa gagn av nýggju tíðini. Hesi londini skuldu fyrireikast til modernaðu tíðina, og meðan tann fyrireikingin var í gongd, vóru hjálondini koyrd inn í eitt „imaginary waiting room of history“ (Chakrabarty 2008: 8).

Nú hevur henda orðingin mest verið nýtt í post-kolonialistiskum kritikki av evropeiskari modernitetsfatan, men henda hugmyndin um, at eitt fólk verður sett at bíða, meðan myndugleikarnir fyrireika tað til at taka ímóti ymiskum tættum av modernaða samfelagnum, kann eisini brúkast í sambandi við føroyska søgu fyrra helming av 19. øld, tá ið tað var vanlig donsk fatan, at „Færøernes beboere, ... , består udelukkende af simple, for højere dannelse blottede, almuesfolk.“ (Thorsteinsson, 1990, col. 111). Henda fatanin var, saman við mótstøðuni í Føroyum, við til at gera, at tað tók so langa tíð at avtaka Einahandilin, og tí ber til at siga, at henda fatan so líðandi avloysti veika statin í javnvágsfelluni.

## *2.4 Bóndasamfelagið*

Tá ið miðsavnaði staturin kom har til, at alt vald varð savnað hjá kongi, gekk tað út yvir aðalstættina, sum sat ovast uppi í feudala samfelagnum, og tað var feudala landbúnaðarsamfelagið, sum helt aftur, so hvørt sum staturin vildi framá í menningini. Í Føroyum var eingin aðalstætt, og tí hevur verið vanligt at nevna føroyska samfelagið bóndasamfelagið heldur enn feudala samfelagið. Nógv av teimum eyðmerkjum, sum í vísindini hava verið nýtt til at lýsa ein bónda í feudala samfelagnum, samsvara væl við bøndur í Føroyum (Joensen 1991: 75), og tí er

helst minni munurin á føroyska bóndasamfelagnum og feudala samfelagnum, tá talan er um hugburðin til broytingar.

Nógvar royndir eru gjøgnum tíðina gjørdar at lýsa bóndasamfelagið. Ein av teimum nýggjastu er tann, sum Steen Busck hevur greitt frá í ritgerð síni *Et landbosamfund i opbrud – Sundby Mors 1660-1800* (Busck 2011). Busck lýsir bóndasamfelagið sum eitt modell, sum er samansett av 12 lutum. Tann fyrsti og týdningarmiklasti luturin er bóndagarðurin, sum var eitt húsarhald, sum framleiddi til sína egnu nýtslu. Garðurin var eisini ein sosialur stovnur og karmur um lívið í øllum sínum lutum hjá teimum, sum hoyrdu til garðin. Í bóndasamfelagnum var eingin skilnaður millum heimalív og vinnulív, og skapanin av hesum skilnaðinum er tí ein týðandi lutur í moderniseringini (Busck 2011: 28–31).

Annan lutin í modellinum nevnir Busch „Selvforsyning og alsidighed", og í tí liggur, at garðarnir kláraðu seg sjálvar á øllum økjum. Á garðinum fingust tey við landbúnað av ymiskum slagi, tey fiskaðu og gjørdu alt handverk og tóku sær sum heild av øllum teimum møguleikunum, sum náttúran beyð teimum. Á tann hátt gjørdist garðurin so sjálvforsýnandi, sum hann kundi gerast, og tí var lítil tørvur á at keypa og selja vørur í hesum samfelagnum (Busck 2011: 32). Landafrøðiliga støðan og veðurlagið í Føroyum gjørdu helst, at føroyskir bøndur høvdu størri tørv á at keypa serliga korn- og timburvørur, enn ein bóndi á meginlandinum hevði, og tí høvdu bóndagarðarnir størri tørv á handilsmøguleikum. Handilin hevði tí avgerandi týdning fyri lívskorini í landinum, og tí er tað eisini skeivt at síggja føroyska bóndasamfelagið sum avbyrgt frá umheiminum, tí altjóða handil og marknaðir, og alt sum rørdi seg har, fekk ógvuliga skjótt ávirkan á føroyska útflutningin og harvið á liviumstøðurnar og samfelagsskipanina (Johansen 1997: 59).

Avmarkaðu handilsmøguleikarnir er triði luturin í modellinum hjá Busck, tí tað, at garðarnir vóru sjálvforsýnandi, gjørdi, at marknaðurin var avmarkaður. Tí var ikki talan um ein marknað, har útboð og eftirspurningur vóru avgerandi, tí marknaðurin megnaði ikki at stýra sær sjálvum. Brúk var tí fyri lógarreglum av ymiskum slagi, og ofta vóru hesar reglur grundaðar í moralskum og átrúnaðarligum normum, og persónlig sambond og vald høvdu stóra ávirkan (Busck 2011: 32–34). Óneyðugt er helst at nevna, at einahandilsskipanin samsvarar væl við hesa hugsan. Búskaparligi parturin av modellinum endar við meirframleiðsluni, sum er fjórði luturin í modellinum hjá Busck. Talan er her um tað, sum garðurin framleiddi, men ikki sjálvur brúkti. Tað fór til almennar stovnar av ymiskum slagi (Busck 2011: 34).

Ættin og bygdarfelagsskapurin eru ávikavist fimti og sætti partur í modellinum. Ættin hevði størri týdning í landbúnaðarsamfeløgum, enn hon hevur í dag, og ættin hevði minst líka stóran týdning í Føroyum, tí sjálvt um stórur sosialur munur var millum ullbiddaran og stórbóndan, so vóru tey so nógv vavd saman í ætt og gifting og annað, at sosial sambond bundu allar bólkar saman tvørtur um ognarmørk (Joensen 1991: 76). Fyri føroyska bóndasamfelagið er kortini




*Í ritgerð síni* Et landbosamfund i opbrud – Sundby Mors 1660-1800 *hevur Steen Busck eina útgreining av, hvat eyðkennir bóndasamfelagið.*

serliga áhugavert at hefta seg eitt sindur við bygdarfelagsskapin. Busck sigur, at bygdarfelagsskapurin var ein stovnur av stórum týdningi, men stórur munur var á, hvussu stóran týdning hesin luturin hevði í ymiskum støðum. Har jørðin í stóran mun varð rikin í felag, hevði felagsskapurin stóran týdning, men aðrastaðni, har garðar lógu meira spjaddir, var hesin luturin ikki so týdningarmikil (Busck 2011: 35–36).

Í Føroyum hevði bygdarfelagsskapurin avgerandi týdning fyri landbúnaðarsamfelagið. Tað sæst m.a. aftur í teimum gomlu siðvenjulógunum, sum kunnu hjálpa okkum at skilja gamla samfelagið. Nógv er gjørt við at greiða frá hesum lógum í stórverkinum *Færøsk bygderet* hjá dómaranum E.A. Bjørk (Bjørk 1956), og í verkinum *Ein føroysk bygd* hjá Poul Petersen verður eisini roynt at lýsa bóndasamfelagið við siðvenjulógum sum høvuðskeldu (Petersen 1968). Hesi bæði verkini eru nevnd við navni her, tí at tey bæði brúka orðið bygd heldur enn bóndi í sínum heiti. Tað er áhugavert, tí spurningurin er, um bygdarfelagsskapurin í Føroyum ikki var so týdningarmikil og stýrandi, at tað hevði verið rættari

at nevnt miðaldarliga føroyska samfelagið fyri bygdasamfelagið heldur enn bóndasamfelagið, tí nógvar siðvenjur geva eina mynd av einum samfelag, sum er skipað í bygdarfelagsskap, og tað gevur á mongum økjum eina øðrvísi siðvenju enn hana, sum hoyrir til samfeløg, har bóndagarðarnir hava verið meira spjaddir og sjálvstøðugir[2]. Spurningurin er eisini, um tað kollektiva í hesum bygdarfelagsskapinum kann hava gjørt føroyska samfelagið uppaftur meira afturhaldssinnað, enn vanligt var í øðrum landbúnaðarsamfeløgum.

Sjeyndi partur í modellinum hjá Busck er góðsið, og áttandi er stættasamfelagið. Hvørgan av hesum hóska til føroyska samfelagið, tí festibøndurnir vóru kongsins bøndur, og arvareglurnar høvdu gjøgnum øldirnar gjørt, at júst kongsbøndurnir komu „til at udgøre eliten og kontinuiteten i det færøske bondesamfund" (Joensen 1991: 75). Níggjundi luturin í modellinum er miðsavnaða valdið, sum upprunaliga hevði til uppgávu at tryggja lóg og landaskil og at skipa verjuna. Busch heldur, at økt hóttan frá øðrum statum gjørdi, at miðsavnaða valdið hevði ein innbygdan hug til at vaksa, og við vøkstrinum var komið upp á eitt ávís stig, har miðsavnaða valdið byrjaði at lyfta seg upp um restina av samfelagnum. Tað var tá, vit fingu ein stat (Busck 2011: 38).

Teir tríggir síðstu partarnir snúgva seg um mentan. Tíggjundi luturin er patriarkalisman, sum eyðkendi allar skipanir í bóndasamfelagnum, og ellivinti partur er átrúnaður, sum bæði umfatar stóru monoteistisku átrúnaðirnar, men eisini meira animistiskar átrúnaðir, sum gjørdu, at fólk ikki altíð høvdu eitt rationelt samband við fólk, lutir og náttúru, men ansaðu eftir ikki at ganga ímyndaðari megi av ymiskum slagi ov nær (Busck 2011: 40).

Tólvti og síðsti luturin í modellinum hjá Busck er traditionalisman, og tað er tann áhugaverdasti fyri hesa ritgerðina, men hann kann illa skiljast uttan at taka hinar lutirnar við. Busck sigur, at fyri bøndurnar var siðvenja virðismiklari enn broyting. Teirra heimsmynd var, at menniskjað var komið frá einari gulløld og síðani fallið til tað støðið, tað nú var á. Tí lá tað besta longur afturi í tíð, og tað ráddi um at halda fast í siðvenjunum, sum vóru arvaðar frá forfedrunum. Forfedrarnir vóru klókari, heiðurligari og betri upp á allar mátar enn nútíðar menniskju. Grundleggjandi fyri bøndurnar var ein fatan av, at heimurin var í javnvág, og henda javnvág skuldi ikki órógvast (Busck 2011: 41).

Í hesum modellinum sæst, at moderniseringin av samfelagnum frá hesum bóndasamfelagnum til eitt modernað kapitalistiskt samfelag skuldi henda við, at stórur partur av vinnuliga arbeiðinum varð skilt sundur frá bóndagørðunum, soleiðis at vinnulív kom at vera fyri seg og heimalív fyri seg, og tá kundu bóndagarðarnir við tíðini mennast til matvøruframleiðarar. Sjálvforsýningin skuldi minkast, so pláss varð fyri einum sjálvvirkandi marknaðarbúskapi. Arbeiðsbýti skuldi fremjast, sum spesialiseraði ymisku arbeiðstættirnar í vinnugreinar, peningurin skuldi gerast til kapital, og húskallar, arbeiðsgentur og onnur í gomlu skipanini

2 Hetta er evni, sum eigur at verða granskað, men tað verður ikki gjørt í sambandi við hesa ritgerðina, og tí verður hugtakið bóndasamfelag eisini framhaldandi nýtt.

skuldu gerast til lønarbeiðarar. Festibóndin skuldi sjálvur eiga jørðina ella vera uppsitari, og góðs og bygdarfelagsskapurin skuldu avtakast. Staturin og stovnar hansara skuldu mennast, og siðbundu stovnarnir avtakast, stættasamfelagið og serrættindi skuldu avtakast, tí øll skuldu verða líka fyri lógini, borgarligt frælsi og privatur ognarrættur skuldu tryggjast, størri munur skuldi gerast á almennum og privatum, og patriarkalisman skuldi avtakast á øllum økjum. Samfelagið skuldi sekulariserast og rationaliserast, og framburðshugsan skuldi avloysa traditionalismuna (Busck 2011: 43–44).

## *2.5 Modernisering og Føroyar*

Henda útgreiningin hjá Busck av skiftinum frá bóndasamfelag til kapitalistiskt samfelag samsvarar væl við ta moderniseringsfatan, sum henda ritgerðin byggir á. Í Føroyum var bygdarfelagsskapurin sterkasti tátturin í bóndasamfelagnum, og samfelagið var í stóran mun skipað innan fyri teir karmar, sum vóru rundan um bygdina. Øll framleiðsla var skipað innan fyri hesar karmar, og teir rukku eisini langt út á hav. Øll høvdu sítt fasta pláss innan fyri karmarnar, og tað merkti, at tey flestu høvdu eina trygga og støðuga tilveru, sum tey kendu. Tí var traditionalisman sterk í Føroyum, og hvørja ferð nýggj hugskot komu fram, var stór mótstøða ímóti teimum. Tí kundi ikki roknast við, at henda samfelagsskipan fór at broytast innanífrá, soleiðis sum hent var aðra staðni í Evropa.

Skuldi ein modernisering av føroyska samfelagnum koma, skuldi hon henda sum ein kollvelting úr erva. Tí gjørdist tað staturin, sum skuldi standa á odda fyri broytingunum, men tað hevði staturin ongan áhuga í, so leingi sum hann var stýrdur av merkantilistiskari hugsan. Staturin var veikur í einum so fjarum parti av ríkinum, og samstundis var tað ein fyrimunur fyri statin, at føroyingar høvdu hosubinding sum høvuðsvinnuveg. Staturin átti sín lut í ekstraktiva bóndasamfelagnum, sum bara styrktist, so leingi sum hosur vóru týdningarmiklasta útflutningsvøran. Bøndur og statur høvdu felags áhugamál, og tað skapti eina javnvágsfellu, sum kom til sjóndar, hvørja ferð okkurt hugskot, sum bar brá av modernisering, tók seg upp.

Tí er lítið at siga til, at staturin royndi at blanda seg so lítið sum til bar upp í viðurskiftini í Føroyum stóran part av 18. øld (West 1985: 9), men tann støðan broyttist, tá ið staturin móti endanum á 18. øld varð ávirkaður av upplýsingarhugsan og seinni liberalistiskum hugsanum. Stættasamfelagið, serrættindi og siðbundir stovnar vóru settir undir trýst, og skjótt merktist tað trýstið eisini í Føroyum. Men føroyska samfelagið var øðrvísi enn tað danska. Her vóru eingi góðs, og kongur átti ta jørðina, sum ikki longu var á privatum hondum. Tí var torført at skilja arbeiðið á bóndagørðunum sundur og gera teir til kapitalistiskar matvøruframleiðarar.

Einstakar royndir vóru gjørdar at nýtímansgera landbúnaðin, men tær vístu mest av øllum, hvussu sterk traditionalisman var í Føroyum. Ein av teimum, sum upplivdi tað, var Born kommandantur, sum í viðmerkingum sínum til frágreiðingina hjá Svabo (Svabo 1976) hevði nakrar lýsingar av, hvussu føroyingar tóku ímóti nýggjum hugsanum. Svabo hevði skotið upp at senda ein norðmann ella íslending til Føroya at leggja lag á við nýggjari landbúnaðartøkni, men tað helt Born lítið um, tí ein slíkur stakkals maður fór at verða yvirdoyvdur, og „Afskye og Had“ fór at vera víst øllum tí nýggja, og nógvar forðingar fóru at verða settar fyri at fáa tiltøkini at miseydnast. Hansara uppskot var tí, at ein lítil oyggj ella ein partur av einari størri oyggj varð sett av til innflytarar úr Noregi ella Íslandi. Tá nýttist teimum ikki at óttast fyri, at føroyingar fóru at forða teimum, og um eitt slíkt stað í fyrstuni varð væl vart og stuðlað, „da troer jeg, at de andre ved dets tiltagende Flor ville faae Øynene aabne“[3].

Born visti eisini um tveir ella tríggjar føroyingar, sum høvdu verið uttanlands og sett seg inn í modernaðan landbúnað. Ein teirra var Plógmaðurin í Skálavík, men hansara royndir vístu, hvussu illa nýhugsan varð móttikin. Har høvdu fólk sagt við hann: „Hold Munden og bliv ved det gamle, eller slaaer selv med din Lee saa længe du vil, jeg giør det ikke. Og vil denne bereiste Stork have Landsfred, da giør han klogest i at tie, og swinge sig i de gamle Folder igien, hvortil han var vandt førend han reiste fra sit Fødeland til en anden“[4].

Teir meira modernaðu føroyingarnir sóu eisini, at traditionalisman var ein avbjóðing, og fyrrverandi presturin J.H. Schrøter lýsti hana í einari av sínum bókum, tá ið hann segði, at einasta ynski føroyinga var at „henleve sin Tid paa samme Viis, som Forfædrene, uden større Rigdom og andre Kundskaber, uden flere Nydelser og Fornødenheder, uden større Opofrelser og Bekostninger, uden høiere Glæder og Fornøielser..... tilfredse med deres Kaar, blev enhver Forandring dem modbydelig.“ (Schrøter 1836: 3)

Broytingar í landbúnaðinum kundu ikki gerast grundarlag undir einari modernisering av føroyska samfelagnum. Skuldi samfelagið koma burtur úr ekstraktiva bóndasamfelagnum og javnvágsfelluni, var tørvur á heilt nýggjum møguleikum. Fiskivinnan var besti vegurin, og tí royndu embætismenn at gera hesa vinnuna til eitt transformatiónsamboð, sum skuldi fáa fólk at royna seg uttan fyri karmarnar um gamla bygdarfelagsskapin. Vónin var, at tað kundi vera við til at fjøltátta vinnugreinarnar og harvið skapa grundarlag fyri einum meira kapitalistiskum búskapi.

Sum tíðin leið, ásannaðu føroyingar, at broytingar vóru neyðugar, og teir embætismenninir, sum vit fara at hoyra nógv meira um í hesi ritgerðini, sóu, at viljin til broytingar var ikki so langt burtur. Tillisch amtmaður setti orð á sína

3 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 23. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum

4 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 45. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum

fatan av traditionalismuni í bóndasamfelagnum, tá ið hann í 1831 skrivaði sínar almennu viðmerkingar til uppskotið um eina grindareglugerð. Har ásannaði hann, at fólk neyvan fóru at verða nøgd við allar reglurnar, men hansara royndir vóru, „at det vel er et almindeligt Træk i Folkets Characteer, at de hænge ved det gamle og hade alt Nyt, dog ofte ønske en gammel Skik, hvis Skadelighed de indsee, ophævet, men af Agtelse for dens Ælde, krympe de sig for selv at giøre noget Skridt dertil, hvorimod de ere velfornøiede, naar den uden deres Medvirkning tilintetgiøres."[5]

Orðingar líkari hesari eru at finna nógva staðni í keldutilfarinum, og vendingin „gammel Skik" sæst so javnan, at ongin ivi er um, at bæði embætismenn og onnur, sum vildu hava nakað nýtt at henda, vóru púra greið um, at traditionalisman fór at verða ein seiglig mótstøða í øllum royndum at fremja nýskapan.

5 Uppskot Tillischar til grindareglugerð dagfest 11. mai 1831. Her er avskriftin hjá John F. West, sum er í sonevndu Grindabókini hjá honum, har ymisk skjøl viðvíkjandi grind eru savnað, nýtt. Grindabókin er á Tjóðskjalasavninum.

# 2. partur
# Bakgrund

# 3. kapittul
# *Amtmansstovnurin*

Endamálið við hesi ritgerðini er at vísa á, at stovnanin av Færø amt hevði ein avgerandi týdning fyri moderniseringina av føroyska samfelagnum, sum í hvussu er kann sammetast við avtøkuna av Einahandlinum. Í hesum bakgrundskapitlinum er ætlanin at greiða frá, hvussu tað almenna var skipað í Føroyum, og hvussu amtið gjørdist partur av hesi skipan. Dentur er lagdur á at lýsa, hvussu sterkt statsvaldið var gjøgnum tíðina, og endamálið er at vísa, at statsvaldið við at seta ein amtmann í Føroyum gjørdist so sterkt, at tað ikki longur var neyðugt at taka tey atlitini, sum gjørdu veika statsvaldið til annað beinið í javnvágsfelluni.

Sjálvt um sagt verður, at Føroyar ikki gjørdust eitt sjálvstøðugt amt fyrr enn í 1821, so er skipanin við amtum og amtmonnum væl eldri enn tað í restini av ríkinum. Amtmansembætið varð sett á stovn stutt eftir, at Fríðrikur 3. tók fult ræði á londum sínum í egnar hendur, og sostatt er stovnurin eitt úrslit av einaveldistíðini. Stovnurin var gjørdur sambært tá galdandi statsideologi, men tað var í vissan mun longu ein gamal stovnur í 1660'unum, tí stovnurin bygdi á røtur, sum røkka langt aftur í tíð. Tað ber til at siga, at amtmenninir vóru víðarimenning av teimum embætum, sum heilt síðani ríkissavningina høvdu umboðað og vart kongsins áhugamál runt um í ríkinum (Flo 2014: 11).

## 3.1 Almenna skipanin fram til Gablatíðina

Júst savningin av norska ríkinum er ein av høvuðstræðrunum í *Føroyingasøgu*, sum er elsta kelda um føroysk viðurskifti, og partur av stríðnum í søguni er spurningurin um at gjalda skatt til norska kongin. Vit hava ongar álítandi keldur um, nær føroyingar fóru at gjalda skatt, men bæði í *Historia Norwegiae* frá 1180 og í *Sverris søgu* verður sagt, at føroyingar gjalda skatt (Debes 1990: 102). Í *Sverris søgu* verður eisini nevnt, at Sverri í sínum ungu døgum kom í trupulleikar av einari ósemju við son „Karls sendimans, sum hevði kongsins sýslur har í oyggjunum" (Debes 1990: 177). Tí verður hildið fyri vist, at norski kongurin í hvussu er síðstu áratíggjuni av 12. øld hevði ein sýslumann í Føroyum at taka sær av kongsins viðurskiftum og tá serliga at krevja inn skatt.

Seinni í miðøld verður hesin umboðsmaður nevndur fúti, og tá verða teir, sum eru undirskipaðir fútan, og sum arbeiða úti í vártingsøkjunum ella sýslunum, nevndir sýslumenn. Vit fáa tá eina skipan við einum fúta og seks sýslumonnum (Nolsøe og Jespersen 2004a: 103). Henda skipanin við fúta og sýslumonnum er

framvegis til á pappírinum, men í dag er fútin avmarkaður til at vera politiovasti, og sýslumenninir eru eisini partur av løgregluliðnum.

Fútin hevði til uppgávu at krevja inn skatt av ymsum slag og aðrar inntøkur hjá kongi, sum t.d. bøtur. Hann skuldi eisini tryggja lóg og landaskil fyri kong og hevði tí hægsta løgreglumyndugleika, og at enda skuldi hann virka sum ákæri á Løgtingi (Nolsøe og Jespersen 2004a: 105).

Løgtingið hevði røtur langt afturi í tíð og var í hvussu er til, tá ið hendingarnar um ártúsundskiftið, sum eru umrøddar í *Føroyingasøgu*, fóru fram. Tá var tingið nevnt alting, men ríkissavningin minkaði um vald tingsins, og serliga var tað Landslógin hjá Magnusi Hákunsson lógbøtara, sum avmarkaði tingið við at taka lóggevandi heimildir frá tí, so tað í mestan mun gjørdist eitt dømandi ting. Løgmaður var formaður á tingi, og so hvørt sum kongsvaldið øktist, gjørdist løgmaður alsamt meira ein kongligur embætismaður, og sum umboðsmaður kongs vaks hansara vald á Løgtingi á sama hátt, sum kongur fekk alsamt størri og størri vald á ríki sínum (Debes 1995: 52).

Umframt Løgtingið vóru eisini seks várting ella sýsluting. Eftir Landslógini sótu 6 løgrættumenn á hvørjum vártingi, sum fútin hevði tilnevnt. Teir skuldu saman við løgmanni døma í málum, sum annaðhvørt sýslumaðurin ella fútin løgdu fyri tingið (Sølvará 2002: 43). Hesir dómarnir á vártingunum kundu skjótast inn fyri Løgtingið, sum á tann hátt eisini virkaði sum ein appeldómstólur. Vártingmenninir sótu eisini á Løgtingi, sum sostatt var samansett av 36 nevndarmonnum (Sølvará 2002: 45).

Pláss verður ikki til at gera meira við áhugaverdu søgu Løgtingsins, sjálvt um nógv meira kundi verið at greitt frá. Eg loyvi mær tí at vísa til Sølvará 2002, Debes 1995 og Nolsøe og Jespersen 2004a, um áhugi er fyri at lesa meira um hetta evnið. Kortini er vert at nevna, at tað við at lesa elstu varðveittu tingbókina frá 1615 til 1654 fæst ein greið kensla av, at tað tá framvegis var ein føroysk elita, serliga umboðað av ávísum ættum, sum hevði avgerandi orðið at siga á Løgtingi, og tað tykist heldur ikki at vera komið fyri, at kongur tá nakrantíð hevði útnevnt nakran annan til løgmann enn tann, sum tingið mælti til. Hesi tingini broyttust stutt eftir, sum greitt skal verða frá í partinum um Gablatíðina.

Mitt í 16. øld ásetti Kristian 3. kongur, at donsku landstingini skuldu hava hvør sín skrivara, sum skuldi skriva dómar, vitnisburðir, brøv og annað í eina tingbók. Hesir skrivarar gjørdust við kongsbrævi 1634 dómarar í undirrættum ella bygdatingum, sum svara til føroysku vártingini (Debes 1995: 57). Fyrsti sorinskrivarin í Føroyum, sum vit vita um, var Gabriel Mitens, sum røkti starvið frá 1584 til 1621 (Debes 1995: 59). Frá bara at skula skriva avgerðir og annað niður á tingi, fekk sorinskrivarin ein størri og størri leiklut, lutvíst tí at hann var tann lógkønasti, og so hvørt sum Løgtingið misti týdning, vuksu uppgávur sorinskrivarans, soleiðis at alt rættarøkið savnaðist á hansara borði, tá ið Løgtingið varð avtikið í 1816 (Sølvará 2002: 56). Føroya rættur verður enn í dag stjórnaður av sorinskrivaranum.

Um ár 1600 vóru soleiðis tríggir høvuðsembætismenn, løgmaður, fúti og sorinskrivari. Harumframt vóru sýslumenn úti í sýslunum, og prestar í samsvarandi prestagjøldum, sum virkaðu undir próstinum, sum í mongum førum virkaði sum tann fjórði høgi embætismaðurin. Teir skuldu røkja tær uppgávur, sum kongur ella tann, sum hevði fingið Føroyar í len frá kongi, løgdu á teir, men teir skuldu eisini taka atlit til føroyingar og ikki minst til valdsstættina á Løgtingi. Varð henda javnvág brotin, kundi misnøgd taka seg upp, og fleiri dømi eru í søguni um stórar trupulleikar av slíkari misnøgd.

## *3.2 Einaveldið skipar ríkið í amtir*

Tað var um reppið, at danska ríkið fór í søguna í árunum 1657-60, tá ið kongur beyð Svøríki av í kríggj, men tapti so dyggiliga. Trý ár við svenskari herseting gjørdu, at ríkið var í stórari kreppu bæði búskaparliga og politiskt, tá ið friður aftur valdaði í 1660. Álitið á gomlu skipanina var fokið, og serliga álitið á aðalsstýrda Ríkisráðið var burtur. Tað endaði tí við, at eitt stættating á heysti 1660 bjóðaði Fríðriki 3. at taka við valdinum[6]. Kongur tók av, og skjótt var danska ríkið eitt av teimum, har einaveldið var sterkast í Evropa.

Kongur fór beinanvegin undir at skipa miðfyrisitingina av nýggjum. Gamla aðalsstýrda Ríkisráðið varð avtikið, og uppgávurnar hjá tí vóru býttar sundur í tvey. Nýggja Ríkisráðið, sum seinni varð nevnt Statskollegiið, Geheimekonseilið og Kabinettið, fekk til uppgávu at ráðgeva kongi, meðan Hægstirættur yvirtók uppgávurnar sum dómstólur. Undir hesum báðum var miðfyrisitingin, sum varð skipað í ymisk kollegiir, sum øll vóru í Keypmannahavn (Lind 2000: 164). Eitt krígskollegii tók sær av øllum hernaðarmálum, og tey bæði gomlu kanseliini, týska og danska kanselliið, tóku sær av øllum teimum málum, sum enn ikki vóru løgd út til aðrar serstakar stovnar (Lind 2000: 170). Harumframt varð eitt nýtt sjálvstøðugt Skattkamarkollegii sett á stovn at taka sær av allari búskaparligari og fíggjarligari umsiting. Skattkamarið broytti í 1679 navn til Rentukamarið (Pedersen 2007: 3).

Undir kollegiunum var lokala fyrisitingin við hópin av ymiskum stovnum. Lensskipanin var týdningarmikil partur av hesi lokalu fyrisitingini, og umsitingin av gomlu lenunum varð løgd undir Skattkamarið. 19. februar 1662 gav Fríðrikur 3. Skattkamarinum boð um, at len og lensmenn skuldu skifta heiti til amt og amtmenn. Amtmenn skuldu taka sær av teirri lokalu fyrisitingini, sum lensmenn høvdu gjørt frammanundan, men meðan orðið len vísti til feudalt frælsi til at ráða í sínum egna øki, so var embætið sum amtmaður eitt kongligt embæti og eitt greitt tekin um, at fyrisitingin nú var partur av einari sterkari miðfyrisiting í Keypmannahavn (Lind 2000: 174).

6 Um hesar hendingar kann t.d. vísast til (Friisberg 2017).

*Sum einaveldiskongur gav Fríðrikur 3. 19. februar 1662 boð um, at len og lensmenn skuldu skifta heiti til amt og amtmenn. (Mynd: wikicommons)*



Upprunaliga vóru tvey sløg av amtmonnum í Danmark. Ovast vóru stiftamtmenn, og so vóru vanligir amtmenn undir teimum. Í Danmark vóru sjey stiftamtmenn, og í fyrstuni vóru 47 amtmenn, men tað talið minkaði so líðandi (Jespersen og Knudsen 2000: 175). Amtmenninir hjá Fríðriki 3. vóru kongsins umboðsmenn í økinum, og teirra týdningarmiklasta uppgáva var at tryggja einaveldið, og soleiðis gjørdist amtmansbústaðurin til ein skansa hjá einaveldinum (Pedersen 1998: 63).

Fleiri uppskot vóru um, hvussu amtsskipanin skuldi vera, men kongur tók undir við uppskotinum hjá Christoffer Gabel, sum vildi hava umsitingina av amtunum býtta sundur í tveir partar, ein myndugleikapart, sum amtmaðurin tók sær av, og ein fíggjarpart, sum amtsforvaltarin tók sær av. Henda skipanin minti um skipanina í hertúgadømunum (Pedersen 1998: 62). Amtmenninir vóru avgerandi amboðið at seta nýggja politikkin hjá stjórnini í verk kring landið, og við øllum teimum frágreiðingum og álitum, sum við tíðini komu frá amtmonnunum til miðfyrisitingina, fekk hon væl betri kunning at taka støðu út frá, enn hon hevði havt frammanundan (Pedersen 1998: 387).

Í ríkinum vóru minst trý sløg av økisumsiting. Í Slesvík og Holsteini var siðaskiftið friðarligt, og tí hevði staturin ongantíð tørv á at taka kirkjujørðina. Av tí sama var tørvurin á stiftamtmonnum heldur ikki til staðar, og tí vóru eingir stiftamtmenn í hertúgadømunum. Í Noregi var siðaskiftið meira ógvusligt, og tað endaði við, at katólskir biskuppar vórðu handtiknir, og kirkjujørðin løgd undir kong. Í 1536 fingu lensmenninir í teimum fýra stiftsbýunum til uppgávu at taka sær av jørðini, og lensmenninir fluttu uppgávuna víðari til fútarnar. Teir umleið 50 fútarnir vóru tí um aldaskiftið 1600 kongligir embætismenn, sum

tóku sær av fleiri av teimum uppgávunum, sum amtmenn fóru at taka sær av í Danmark, og samstundis førdu teir eisini roknskap og kravdu inn skatt, eins og amtsforvaltarin gjørdi í Danmark. Eftir at einaveldið varð innført, fóru inntøkurnar frá fútunum beint til teir fýra stiftamtmenninar uttan um amtmenninar (Pedersen 1998: 389). Av tí sama var uppgávan hjá norsku amtmonnunum ikki so víð, sum hjá teimum donsku, og við ongum amtsforvaltarum stóð amtið veikt í norsku umsitingarskipanini, har fútarnir og stiftamtmenninir vóru tey týdningarmiklastu og sterkastu liðini (Pedersen 1998: 390). Í Noregi høvdu sorinskrivarar eisini rættarskipanina og skiftiskipanina undir sær, og tað minkaði uppaftur meir um støðuna hjá amtunum samanborið við tey donsku amtini (Pedersen 1998: 67).

Fyri 1660 høvdu aðalsmenn einarætt til lensmansstørv, og sjálvt um tað ikki formliga var galdandi, eftir at amtini vóru innførd, so vóru nógv teir flestu amtmenninir fyrstu tíðina aðalsmenn. Ein orsøk var, at amtmenninir ongantíð fingu eina ordiliga løn, og tí var tað undir einaveldinum ein fortreyt, at tú átti eina munandi ogn ella hevði góðar inntøkur aðrastaðni frá, um tú skuldi vera amtmaður. Tí vóru so gott sum allir amtmenn heilt fram til 19. øld samstundis góðseigarar (Pedersen 1998: 395).

Eingin uppreistur var ímóti innføringini av amtsskipanini, og ein orsøk var, at Fríðrikur 3. longu frammanundan hevði syrgt fyri at seta sínar menn á teir týdningarmiklastu lenspostarnar (Pedersen 1998: 396). Fríðrikur 3. bant seg í hondfestingini frá 1648 til at seta ríkisráðslimirnar sum lensmenn, so at teir tann vegin kundu fáa løn fyri sítt arbeiði fyri stjórnina. Eftir kollveltingina í 1660 helt hesin lønarmátin uppat, men á vári 1661 fingu lensmenn av hesum slag loyvi til halda fram sum lensmenn undir lagaligari treytum enn vanligir lensmenn í enn eitt ár (Pedersen 1998: 50).

Eftir at Kristian 5. kongur avloysti pápa sín í 1670, vóru amtini umskipað við amtsnýskipanini í 1671. Við hesi skipan fingu stiftamtmenninir væl størri heimildir (Pedersen 1998: 388), og 25. mai 1671 kom ein fyriskipan um ein nýggjan lens- og hovaðal. Ætlanin var at løna teimum, sum stóðu kongi serliga nær. Um tey áttu nóg nógva jørð, kundu tey stovna eitt greivadømi ella eitt barónsdømi, ið sum len var undirskipað kongi. Greivarnir fingu beinanvegin amtmansheimildir á góðsum sínum, og barónarnir fingu slíkar heimildir í 1674. Greivarnir høvdu eitt serligt samband við kong, og teir vóru tí ikki embætismenn, og vanligu reglurnar vóru heldur ikki galdandi fyri teir. Teir høvdu eina serstøðu í einaveldinum sum sjálvstøðugar regionalar umsitingareindir (Pedersen, 1998a: 83).

Fyri kongarnar Fríðrik 3. og Kristian 5. hevði tað ikki so nógv at siga, hvussu amtmenninir røktu sínar uppgávur, tí tað vóru persónarnir, sum vóru týdningarmestir. Tað broyttist í 18. øld, tí tá gjørdist tað týdningarmikið at hava dugnaligar embætismenn at røkja amtmansuppgávurnar (Pedersen 1998: 397). Tí var innføringin av amtsskipanini meira ein kollveltandi broyting á pappírinum, enn hon var í veruleikanum. Umsitingin av ymisku landafrøðiligu økjunum helt í stóran mun fram sum undir lensskipanini, og fleiri áratíggju gingu, áðrenn

umsitingin virkaði soleiðis, sum ætlanin hevði verið í Keypmannahavn í 1662. Leingi kundi tað sæð út til, at amtmansembætini vóru persónlig heiðursembæti hjá aðalsmonnum, sum tann vegin eisini kundu fáa eina inntøku (Flo 2014: 11).

## *3.3 Gabel stovnar amt og fær Føroyar í len*

Í Føroyum merktist av álvara, at kongur og myndugleikarnir í Keypmannahavn vóru farnir undir nýggjan politikk, har meira vald skuldi savnast í Keypmannahavn, tá ið nýggjur løgmaður skuldi finnast fyri Jóan Justinussen, sum doyði í 1654. Føroyingar høvdu mælt til at útnevna Jógvan Poulsen av Oyri, men tá ið boðini komu úr Keypmannahavn í 1655, hevði kongur sett danan Baltsar Jacobsen til løgmann. Samstundis tók kongur lenið aftur frá Frederik Willumsen Rosenvinge og gav tað til Kristoffur von Gabel (Debes 1995: 220).

Fyri tær sterku ættirnar í Føroyum mundi henda tilnevningin kennast sum ein hóttan, og misnøgdin við Baltsar Jacobsen, sum í søguni hevur fingið navnið Illi løgmaður, var stór. Hvussu nógv av hesi misnøgd var verulig, og hvussu nógv av henni stavar frá, at nýggi løgmaðurin hótti gomlu valdsskipanina, er ongantíð kannað, men í øllum førum endaði tað við, at Baltsar Jacobsen varð koyrdur frá sum løgmaður í 1661, og tann, sum løgtingið upprunaliga hevði útpeikað, tók við. Síðani hildu umboð fyri múgvandi ættirnir fram sum løgmenn í meir enn 100 ár afturat.

Kristoffur von Gabel var ikki aðalborin, men hann megnaði at vinna sær hægstu álitisstørv, og tað gjørdi hann fyrst og fremst orsakað av tí vælvild, hann dugdi at vinna sær frá Fríðriki 3. kongi. Kristoffur var sonur ein kongligan proviantmeistara í Glückstadt, og hann varð føddur 6. januar 1617. Longu í 1639 var hann kamartænari og kamarskrivari hjá Fríðriki, sum tá var hertúgi og erkibiskupur í Bremen. Sum slíkur førdi hann roknskapin hjá honum, og frá 1642 stýrdi hann árligu forrætningunum hjá prinsinum við umslagið í Kiel. Hann fór við prinsinum til Danmarkar, og tá ið Fríðrikur gjørdist kongur í 1648, var løn hansara 340 ríkisdálar (Andersen 1964: 67).

Gabel tók sær av roknskapinum í kongsins kamari, og hetta var týdningarmikið starv, tí hagar komu inntøkurnar frá Oyrasundstollinum, og Gabel megnaði eisini at tryggja kamarkassanum fleiri nýggjar inntøkur í 1650-árunum. Sum kamarskrivari tók hann sær eisini av sambandi kongs við handils- og vinnulívsfólk í Keypmannahavn (Friisberg 2017: 68). Hesi sambondini við keypmannahavnska borgaraskapin komu sera væl við, tá ið Gabel skipaði fyri statskvettinum í 1660 saman við Fríðriki 3. og m.ø. Hannibal Sehested (Friisberg 2017: 171).

Gabel hevði ein avgerandi leiklut í øllum teimum leikunum, sum leiktir vóru í sambandi við, at Fríðrikur 3. gjørdist einaveldiskongur, og hann var tann fyrsti av ráðgevum kongs at fáa løn fyri stríðið, tá ið hann 11. november 1660 varð útnevndur til rentumeistara, lim í Statskollegiinum og stutt eftir til



*Kristoffur von Gabel hevði ein týðandi leiklut, tá ið Fríðrikur 3. gjørdist einaveldiskongur í 1660. (Mynd: wikicommons)*

assessor í Hægstarætti (Friisberg 2017: 229). Seinni gjørdist hann stathaldari í Keypmannahavn, Geheime-, stats- og kamarráðslimur, og hann varð eisini tikin upp í aðalstættina í 1664. Gustav Duwall, ein svii, sum búði við hoffið, skrivaði í frágreiðing 1661, at „Gabel fører nu Værket alene til manges Klager. Han frygtes mere end nogen anden“ (Andersen 1964: 67–68). Sambært Duwall hendi einki í hovinum, uttan at Gabel hevði góðtikið tað. Hann var „den rette mignon du roi“ (Friisberg 2017: 294).

Alt hetta vísir, hvussu stóra ávirkan Gabel hevði, og tað virkar tí eitt sindur ótrúligt, at kongur skuldi geva Gabel Føroyar í len sum eina vinargerð, ella tí at kongur skyldaði honum pening, sum vanliga hevur verið hildið. Ein maður við so stórum valdi og ríkidømi sum Gabel hevði lítlan tørv á Føroyum, og hann kundi helst lættliga valt sær aðrar lættari inntøkumøguleikar, um so var. Ein onnur vanlig fatan er, at tað, at Gabel fekk Føroyar í len, hevði við sær, at Føroyar endaðu uttanfyri ta alsamt styrknaðu miðfyrisitingina, sum stóð á odda fyri samfelagsmenningini í restini av ríkinum.

Spurningurin er, um hesar vanligu fatanirnar eru rættar, tí ábendingar eru um, at ein meginorsøk til, at Gabel fekk Føroyar í len, var tann, at hann skuldi tryggja hollendsk áhugamál í Føroyum, ella meir neyvt tryggja, at Danmark uttanríkispolitiskt hevði gott samstarv við Holland. Tað er víst á, at sama grundgeving helst var fyri, at Henrik Bielke í 1648 fekk Ísland í len (Friðriksson og Þór 2013: 212). Henrik Bielke var, eins og Gabel, ein av høvuðsstuðlunum hjá Fríðriki 3., tá ið hann gjørdist einaveldiskongur, og um somu tíð gjørdist Bielke forseti í Admiralitetinum og limur í Statkollegiinum og Hægstarætti, eins og Gabel. Spurningurin er tí, um tað, at hesir báðir menn fingu ávikavist Ísland og Føroyar í len, ikki heldur skal síggjast sum ein partur av uttanríkispolitikkinum

hjá styrkta statinum hjá Fríðriki 3., heldur enn at teir bara fingu londini sum gávu frá kongi. Heldur hesin pástandur, høvdu Føroyar og Ísland frá byrjan av stóran uttanríkispolitiskan týdning fyri einaveldisríkið, og londini vóru sostatt ikki ein útjaðari, sum var gloymdur í øllum teimum nýskipanunum, sum einaveldismenn fóru undir at fremja.

Hinvegin fekk ein annar av kongsins dyggastu ráðgevum, Johan Christoffer Körbitz, lenið Idd og Marker í Noregi í 1655 (Pedersen 1998: 57), sama ár sum Gabel fekk Føroyar í len. Einki verður nevnt um, hví Körbitz fekk hetta lenið, men lenið er syðst á markinum millum Svøríki og Noregi, so tað kann eisini hava havt okkurt við hernaðarliga verju at gera. Er talan hinvegin bara um eina gávu frá kongi, so er eisini hugsandi, at Føroyar sum len hevur verið nýtt á sama hátt. Tað má standa eftir sum ein opin spurningur til framtíðar gransking.

Christoffer Gabel er fyrstu ferð nevndur í løgtingsbókunum 1. september 1657, tá ið eitt bræv frá honum til føroyingar, dagfest 26. apríl 1657, er avritað. Í brævinum gav hann føroyingum boð um at hjálpa til at byggja uppaftur Skansan í Havn og manna hann. Føroyingar svaraðu aftur 10. juni 1657, og teir góðtóku at byggja skansan uppaftur og at finna 30 mans at manna hann. Útreiðslurnar av hesum skuldu gjaldast við, at eitt avgjald varð lagt á hvørja jarðarmørk (Joensen 1958: 76–78).

Hetta var um júst somu tíð, sum Fríðrikur 3. fekk undirtøku fyri at hækka skattir og avgjøld, so at ríkið kundi brynja seg til kríggj móti svenska konginum Carl Gustavi, sum herjaði longri eysturi í Evropa. At Svøríki gjørdist sterkari, hevði við sær, at danski kongurin fekk tilboð frá fleiri av evropeisku stórveldunum um at gera alliansur, og tað eggjaði so aftur kongi til at fara í kríggj. Endin varð, at danir sendu svium eina krígsavbjóðing 1. juni 1657, og minni enn ein mánað eftir tað var Carl Gustav farin norður um suðurmarkið í Holsteini. Nakrar mánaðir seinni høvdu sviar tikið so at siga alt Danmark, og 26. februar 1658 noyddist Fríðrikur at skriva undir friðarsáttmála, sum millum annað hevði við sær, at Skåne, Halland og Blekinge gjørdust svensk (Olsen og Scocozza 2003: 220–222).

Friðurin helt ikki leingi, tí longu sama summarið brast á aftur millum londini, og frá 11. august 1658 kringsettu sviar Keypmannahavn (Olsen og Scocozza 2003: 223). Tá varð Gabel sendur til Hollands at samráðast um at fáa hollendingar at hjálpa. Gabel fekk nógv burtur úr samráðingunum, og úrslitið varð, at allur hollendski hernaðarflotin varð savnaður, og undir leiðslu av Opdam admirali setti hann leiðina norðureftir. Hollendingar vunnu 29. oktober 1658 á svenska flotanum í slagnum í Oyrarsundi (Schrøter 1836: 25). Tað merkti, at hermegi, útbúnaður og matur aftur fekst til Keypmannahavnar gjøgnum Amager, og tað gjørdi sítt til, at sviar ongantíð megnaðu at taka Keypmannahavn (Olsen og Scocozza 2003: 224).

Í torføru samráðingunum hjá Gabel við hollendingar vóru Føroyar ein av trumfum hansara. Holland og Ongland sótu ikki væl um sátt, so stóru eystur-indiaskipini fingu ikki siglt gjøgnum Ermasund. Tí høvdu hollendingar brúk fyri



*Gabel varð í 1658 sendur til Hollands at fáa hollendska herflotan at hjálpa dønum í krígnum við Svøríki. Tað eydnaðist, og 29. oktober sama ár vunnu hollendingar í slagnum í Oyrarsundi. Hesin sigur var avgerandi fyri, at tað ongantíð eydnaðist svium at taka Keypmannahavn. Ábendingar eru um, at Føroyar høvdu týdning í samráðingunum, sum Gabel hevði við hollendingar. Á málninginum hyggur svenski kongurin Carl X Gustav at, meðan hollendski flotin siglir fram við Krúnborg inn í Oyrarsund, uttan at sviar fáa gjørt nakað við tað, tí kanónirnar røkka ikki út til skipini. Fredrik Christian Lund málaði málningin, sum hongur á Statens Museum for Kunst. (Mynd: wikicommons)*

einari millumstøð, har skip kundu savnast á leiðini. Sambært gomlum sagnum var nógv hollendsk ferðsla av hesum slag í Føroyum, og skipini savnaðust vanliga í Nólsoyarfirði á veg til Asia, og í Sørvági, Vestmanna, Klaksvík og í Suðuroy á veg heimaftur (Schrøter 1836: 24)[7].

Sama mánað, sum hollendingar vunnu slagið í Oyrarsundi, oktober 1658, sendi Gabel boð um, at Johan Heidemann orsakað av krígnum skuldi fara til Føroya sum skjótast at verja landið móti álopum. Fyri at tað skuldi ganga skjótt fyri seg, skuldi hann taka galiottina hjá Gabel, sum lá í Amsterdam, og sigla beint til Føroya. Í Hollandi skuldi hann fáa kanónir og krút, og hann kundi fáa sær 8 ella 10 mans, sum gott kundu vera norðmenn, um teir vóru at finna. Hesir skuldu so virka sum korporalar, og ein av teimum skuldi vera konstábul. Hann

7 Hesir upplýsingar skulu takast við fyrivarni, tí eg havi ikki sæð tað nevnt aðrastaðni enn hjá Schrøter. Spurningin, um Føroyar høvdu nakran leiklut í samráðingunum við Holland í 1658, eigur at bera til at kanna við upprunaligum keldutilfari annaðhvørt í Keypmannahavn ella í Hollandi, men verri verður at gera nakað meira við tær sagnirnar, sum longu í 1836 vóru gamlar.

fekk eisini at vita, at um Íslendska kompaníið ikki fekk vørur til Føroya, so skuldi hann fara við galiottuni til Amsterdam eftir góðum vørum (Joensen 1958: 155).

Hesi boð fingu Schrøter at spyrja, um skansin, sum Gabel hevði givið boð um at byggja uppaftur, ikki varð bygdur fyri at verja hollendsk skip heldur enn at verja handilshúsini á Tinganesi, soleiðis sum vanlig hugsan hevði verið (Schrøter 1836: 25). Hesin ógvuliga áhugaverdi spurningurin sæst ikki at hava verið viðgjørdur síðani 1836, men hann samsvarar væl við hugsanina um, at orsøkin til, at Gabel fekk Føroyar í len, var, at hann skuldi tryggja, at Danmark uttanríkispolitiskt framhaldandi hevði gott samstarv við Holland. Undir øllum umstøðum man tað fara at vera meira gevandi at kanna Gablatíðina við útgangsstøði í, at Føroyar á henda hátt høvdu ein virknan leiklut í strembanini hjá einaveldiskongi at styrkja statin, heldur enn at halda fast í, at Føroyar komu at vera undir persónliga einaveldi Gabels (Debes 1995: 220), og tí endaðu uttanfyri statsvaldið, um somu tíð sum Fríðrikur 3. savnaði alt vald undir sær sum einaveldiskongur, væl hjálptur av júst Gabel. Eitt annað dømi um, at Føroyar hesa tíðina vórðu nýttar í uttanríkispolitiska samskiftinum hjá kongi var, at kongur undir friðarsamráðingunum í Roskilde í 1658 var til reiðar at lata svenska konginum Carl Gustavi Føroyar, um hann afturfyri vildi sleppa kravinum um Bohus len (Sølvará 2017: 223).

## *3.4 Føroyar amt longu í 1662*

Í føroyskari søguskriving hevur verið vanligt at siga, at Føroyar ikki komu undir amtsskipanina fyrr enn í 1720, tá ið íslendski stiftamtmaðurin fekk Føroyar at umsita. Í *Havnar søgu* stendur t.d., at Ísland hevði ein stiftamtmann longu í 1661, men „í Føroyum ráddu lensharrarnir og feðgarnir Kristoffur og Fríðrikur von Gabel, tí teir høvdu fingið Føroyar í len fyri lívið" (Nolsøe og Jespersen 2004a: 114). Hans Jacob Debes brúkar eisini heitið lensmaður fleiri staðni í kapitli sínum um Gablatíðina í *Føroya søga 2* heilt fram til staðfestingina av, at „hin 21. juni 1708 doyði lensharrin Fríðrikur Gabel". Í næsta setningi sigur hann, „at hann (Gabel) hevði eisini verið amtmaður", men henda staðfesting verður hvørki útgreinað ella skjalprógvað (Debes 1995: 253). John F. West skrivar í bók síni um Føroyar árini 1709-1723, at Føroyar vóru einasta undantakið frá miðsavnanini av danska ríkinum í 1660-árunum. Orsøkin til hesa løgnu støðu var, at Gabel fekk Føroyar í len, tí kongur vildi geva honum eina hóskandi gávu aftur fyri alt arbeiði hansara fyri kong (West 1985: 13).

At Gabel-feðgarnir vóru lensmenn so leingi, passar illa saman við, at kongur í 1662 gav boð um, at lensmenn skuldu verða amtmenn, og lenini gerast til amt. Sambært tí átti Kristoffur Gabel tá at skift heiti frá at verið lensmaður til at verða amtmaður í Føroyum, og Føroyar skuldu itið amt heldur enn len. Ein leyslig gjøgnumgongd av skjølum frá tíðini vísir eisini, at Gablarnir vórðu nevndir amtmenn, og Føroyar roknaðar sum amt. Ein orsøk til, at Føroyar í søguskrivingini

um seinna helming av 17. øld ikki hevur verið hildið at verið eitt amt, kann vera, at Føroyar ikki vóru roknaðar sum partur av kongsins donsku ella norsku amtum og tí ikki eru taldar við í uppreksanum av amtunum. Ein onnur orsøk kann vera, at so stórur munur var á Gablunum og teimum amtmonnunum, sum virkaðu 200 ár seinni, og tí fingust teir illa at samsvara við hugmyndina av, hvat ein amtmaður var. At enda er ikki óhugsandi, at myndin av Gablunum sum kúgarum hóskaði væl til tjóðskaparligu søgufatanina.

Ein samanbering við søguna um donsku og norsku amtskipanina vísir kortini skjótt, at Føroyar væl kunnu hava verið roknaðar sum eitt amt, og Gablarnir roknaðir sum amtmenn, tí sjálvt um heitini skuldu broytast í 1662, so tók tað tíð at broyta alla lensskipanina til eina almenna umsitingarskipan, og nógv dømi eru um, at lensmenn hildu fram sum amtmenn. Saman við mongu dømunum um, at orðini amtmaður og amt eru nýtt í skjølum frá Gablatíðini, er lítil ivi um, at Føroyar longu frá byrjan av vóru roknaðar sum eitt amt við einum amtmanni, sum ongantíð búði í Føroyum.

Kanna vit løgtingsbøkurnar, sæst, at árini fram til 1661 verður Gabel nevndur „Forvalter og Kammerskriver" fimm ferðir (Joensen 1958: 76, 77, 81, 154, 160), og „Her Kammerskriver" seks ferðir (Joensen 1958: 98, 100, 103, 153, 189, 201). Eina ferð verður hann nevndur „Konnings Krigs Comissarie" (Joensen 1958: 158), eina ferð „Gunstige Landsherre" (Joensen 1958: 81) og fýra ferð „Lensmand" (Joensen 1958: 100, 154, 158, 161). Í tíðini eftir at lenini vóru broytt til amt, kemur tað bara tvær ferðir fyri, at Kristoffer Gabel verður nevndur „Lensherre", og í báðum førum er talan um brøv, sum ávikavist tingmenn og fútin hava skrivað (Joensen 1961: 14, 209). Tríggjar ferð varð hann nevndur „Landsherre" (Joensen 1958: 220, 318)(Joensen 1961: 16) og fýra ferð „Rentemester" (Joensen 1958: 251, 277, 278, 278), men vanliga var heiti hansara „Stadtholder", sum kemur fyri meir enn fimmti ferðir í tingbókini. Hinvegin verður Gabel bara eina ferð nevndur „Ambtmanden", og tað var í brævi frá Keypmannahavnar slotti dagfest 13. august 1669 (Joensen 1961: 58).

Torført er at koma til nakra niðurstøðu út frá hesum heitum, tí Kristoffer Gabel hevur vanliga verið nevndur við tí ovasta embætinum, hann hevði. Hesi lógu oman fyri bæði lens- og amtmansembætini, og tí er ógreitt, hvat av teimum, hann hevði nýtt, um tað var ovasta embæti hansara. Tað er tó greitt, at hvørki Gabel sjálvur ella umsitingin í Keypmannahavn í teimum skjølum, sum eru í tingbókunum, nevna hann lensmann. Tað gera føroysku tingmenninir eina ferð, og eina ferð ger fútin tað í sambandi við eitt mál um aðalsgóðs í Føroyum. Tað kann vera komið av gomlum vana ella av ósketni, og tí er í tingbókunum einki prógv fyri, at Gabel hevur verið roknaður sum lensmaður, eftir at kongur 19. februar 1662 sendi boð út um, at lensmenn eftir tað skuldu eita amtmenn.

Í einum longum verjuskrivi, sum Fríðrikur Gabel skrivaði 5. februar 1673, har hann royndi at verja pápa sín ímóti føroyskum kærum, nevndi hann fleiri ferðir pápa sín amtmann. Einaferð vísir hann á, at fútin er langt burtur frá amtmanni

sínum (Schrøter 1836: 78), og seinni segði hann, at løgmaður tordi at døma bæði prestar og sjálvan amtmannin, og við teirri grundgevingini segði hann, „at de Færøiske snarere skal faae Ret der i Landet, end Kongen selv eller Amtmanden." (Schrøter 1836: 89) Kortini gramdi hann seg um, at Lucas Debes hevði savnað saman klagur frá føroyingum, uttan at faðir hansara, „som allernaadigst betroed er at være Amtmand over Landet," hevði biðið um tað (Schrøter 1836: 92). Var rætt atborið sambært lógini, so átti Debes fyrst at lagt kærurnar fyri Gabel sum amtmann, og bara um hann ikki har fekk rætt, kundi hann fara víðari til kong við klagunum (Schrøter 1836: 93).

Hetta kann illa skiljast øðrvísi enn, at Gablarnir í hvussu er sjálvir roknaðu seg sum amtmenn, og sum vit hava sæð, var umskipanin frá lenum til amt mest á pappírinum í byrjanini, og serliga fyri eitt so fjarskotið og lítið land sum Føroyar mundi lítið vera í vegin fyri, at Gabel bæði varðveitti Føroyar sum len og eftir 1662 fór at nevna seg amtmann. Vert er eisini at nevna, at ein av samstarvsmonnunum hjá Gabel, Johan Christof Köbitz, slapp at varðveita lenið Idd og Marker í Noregi, sum hann hevði fingið í 1655, sum tøkk fyri alt tað, hann hevði framt undir hersetingini av Keypmannahavn, og hann gjørdist harumframt Sælands stiftamtmaður og amtmaður í fleiri amtum á Sælandi (Pedersen 1998: 57).

Upprunin til føroysku kærurnar móti Gabel kunnu leiðast aftur til kongsskiftið í 1670, tí tað merkti fyri Kristoffur Gabel, at hansara tíð á toppinum í danska statinum var liðug. Nýggi kongurin, Kristian 5., sat ikki væl um sátt við Gabel, og stutt eftir, at hann gjørdist kongur, varð mótstøðumaður Gabels, Griffenfeld, settur í hægsta embætið í statinum.

Kristian 5. og Griffenfeld fóru beinanvegin undir at skipa amtini av nýggjum. Eldri hálvbróðir Kristian kongs, Ulrik Frederik Gyldenløve, var stathaldari í Noregi, og tað var uttan iva hann, sum gjørdi, at nýskipanin fyrst varð framd har. Ein nevnd varð sett í mars 1670 at kanna norsku amtsskipanina og gera eitt uppskot til, hvussu hon kundi bøtast. Hetta uppskot varð sett í verk 8. februar 1671, tá ið Noregi varð býtt sundur í fýra stiftamt og undir teimum aftur átta amt (Pedersen 2007: 5). Ætlanin hjá Gyldenløve var, at norska skipanin eisini skuldi setast í verk í Danmark, men Skattkamarið vildi ikki hava, at amtini viknaðu, so endin varð, at høvuðsbroytingin gjørdist, at stiftamtmenninir í Danmark fingu eina sterkari støðu oman fyri amtmenninar, men annars helt skipanin fram mestsum óbroytt (Pedersen 2007: 6). Um nakar hugsaði um Føroyar og Ísland í sambandi við hesar broytingar, er óvist, men greitt er, at skipanin var til reiðar at seta ein amtmann fyri Ísland, so skjótt sum seinasti lensmaðurin har doyði. Tað hendi í 1683 (Friðriksson og Þór 2013: 228).

Tá ið Gabel hevði mist sína valdsstøðu, fór Løgtingið at savna saman kærur um viðurskiftini í Føroyum á ólavsøku 1672. Burtur úr hesum kærum kom, at tríggir sendimenn vóru sendir at leggja málið fyri kong, og tá ið hann í oktober hevði hoyrt klagurnar, avgjørdi hann at seta niður eina kanningarnevnd, har



*Gabel misti sterku støðu sína í danska ríkinum, tá ið Fríðrikur 3. doyði í 1670. Gabel sat ikki væl um sátt við nýggja kongin Kristian 5., og hann setti dyggasta mótstøðumann Gabels, Peter Schumacher Griffenfeld, í statsins hægsta embætið. (Mynd: wikicommons)*

m.a. embætisførslan hjá hægstu embætismonnum og handlinum í Føroyum varð umrødd (Debes 1995: 228). Burtur úr arbeiðinum hjá kanningarnevndini kom ein nýggj reglugerð frá 16. apríl 1673 um ymisk føroysk viðurskifti. Hon vísti greitt, at sendimenninir høvdu fingið undirtøku fyri nógvum av kærunum, og embætismenninir fingu greiðari reglur at arbeiða eftir, so teir ikki kundu fara við fólkinum, sum teir vildu, men tað er eisini greitt, at reglugerðin serliga styrkti samfelagsstøðuna hjá prestastættini og kongsbóndastættini (Debes 1995: 234). Tað, sum er serliga áhugavert fyri hesa ritgerðina, er, at tað í 11. grein í reglugerðini stendur, at amtið og keypmaðurin skuldu lata yvirmanninum á skansanum sína løn (*Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission, nedsat i Henhold til Lov af 13/3 1908* 1911: 41). Sambært hesari kelduni, sum má metast at hava stóran týdning, vóru Føroyar roknaðar sum eitt amt í 1673.

Stutt eftir, at reglugerðin um ymisk føroysk viðurskifti var undirskrivað, fekk Kristoffur von Gabel 24. mai 1673 váttan fyri, at sonur hansara skuldi taka við Føroyum sum len, eftir at hann var deyður. Kristoffur von Gabel doyði fáar mánaðir seinni, 13. oktober 1673, og tá fekk Fríðrikur Gabel Føroyar í len. Spurningurin er so, um hann roknaði seg sum lensmann ella amtmann.

Í løgtingsbókini fyri árið 1674 sæst, at fleiri brøv vóru løgd fram á ting frá Fríðriki Gabel, sum hevði tikið við Føroyum sum len eftir faðir sín. Í fyrstu noteringini varð hann nevndur „Lensherren", í aðru „Hans Exell. og velborne Herre", men síðani verður hann bara nevndur „Her Ambtmand" seks ferðir (Joensen 1961: 224–225). Síðani verður Fríðrikur Gabel lýstur sum amtmaður

á so at siga hvørjari síðu í tingbókini komandi árini, og viðhvørt verður Johan Heidemann eisini nevndur „Amtsforvalter“. T.d. læt Heidemann 3. august 1674 á Løgtingi lesa upp „min Fuldmagt om Amtsforvaltningen her over Ferøe Ambt for dette Aar af den velbaarne Herre Fredirich von Gabell H.K.M. til Dannemarch og Norgen, forige Envoye Extraordinaire udi Frankrige, Ambtmand over Ferøe, herr til Gischenhagen og Bouelsøe“ (Joensen 1961: 238). Johan Heidemann virkaði sum fulltrúi hjá amtmanninum, sjálvt um ein annar maður var fúti fyri kong um somu tíð.

Í tingbókini fram til 1677 verður Frederik von Gabel bara eina ferð nevndur annað enn amtmaður, og tað var í einari vitnisfrágreiðing frá einum soldáti, sum segði, at loytnanturin á Skansanum hevði kallað Gabel „Landtzforpachter“ og fútan „Landsforvalter“ (Joensen 1961: 266). Tað er tí eingin ivi um, at Fríðrikur von Gabel roknaði seg sjálvan sum amtmann í Føroyum, og fulltrúi hansara varð nevndur amtsforvaltari. Hetta við, at Gabel hevði ein amtsforvaltara, er eitt sindur sjáldsamt, tí í donsku skipanini var amtsforvaltarin ein sjálvstøðugur embætismaður, sum tók sær av at krevja inn skatt og halda roknskap í amtunum. Ta uppgávuna hevði kongsins fúti í Føroyum, á sama hátt sum fútarnir í Noregi høvdu, so talan er ikki um ein amtsforvaltara í rætta týdninginum av tí heitinum.

Fríðrikur Gabel varð føddur millum 1640 og 1647. Hann umsat lenið tey síðstu árini, pápin var á lívi. Í 1666 varð hann gjørdur kamarharri, í 1668-70 var hann sendimaður í Fraklandi, í 1676-78 sendimaður við russiska hovið, og seinni var hann í Berlin. Fríðrikur gjørdist riddari av Dannebrog í 1684 og um somu tíð amtmaður í Sorø og Ringsted amtum (Degn 1934: 160).

Í 1680-árunum styrktist einaveldið, og einaveldisstaturin gjørdist betur skipaður. Hetta varð serliga gjørt við Donsku lóg Christians 5. frá 1683, og Norsku lóg Christians 5. frá 1687, sum var galdandi í Føroyum. Í hesum lógum vóru fýra stuttar reglur um stiftamtmenn og amtmenn. Í nýggju lógunum stóð bara ein lítil partur av teimum uppgávum og skyldum, sum embætismenn høvdu, og fyri at gera tær uppgávurnar greiðari, komu hesa tíðina fleiri instruksir til ymisk sløg av embætismonnum. Í 1685 var túrurin komin til norsku amtmenninar, sum tað árið fingu instruksir, sum komu at verða galdandi í næstan 300 ár (Flo 2014: 16).

Týdningarmiklasta uppgávan hjá amtmonnunum stóð í § 1, har amtmanninum varð álagt at umboða, fremja og verja kongsins áhugamál og rættindi í amtinum, men hann skuldi eisini fremja áhugamálini hjá økinum. Henda dualistiska uppgávan komst helst av, at seinna uppgávan var mett at vera ein natúrlig fylgja av teirri fyrru, og helst hevur ongin hugsað um, at áhugamálini hjá íbúgvunum í amtinum kundi gerast nøkur onnur enn tey, sum tæntu einaveldisstatinum best. Tað var ymiskt, hvussu stóran dent ymiskir amtmenn løgdu á at fáa miðfyrisitingina til at virka við til at menna átøk, sum vóru til gagns fyri íbúgvarnar í amtunum (Flo 2014: 17). Við hesi regluni fingu amtmenninir bæði heimild og skyldu til at taka stig til m.a. nýggj vinnuátøk og á tann hátt virka sum ein innovativ megi í sínum øki. Hetta fekk stóran týdning ikki minst fyri eitt fjarskotið



*Fimm ára gamli sonur kongs Ulrik Christian Gyldenløve var í 1684 settur sum fyrsti stiftamtmaður fyri Ísland. Møguliga var hann eisini stiftamtmaður fyri Føroyar, eftir at Fríðrikur Gabel doyði í 1708. (Mynd: wikicommons)*

bóndasamfelag, har lítil møguleiki var fyri, at nøkur innovatión skuldi koma innan úr samfelagnum sjálvum. Lógarheimildin var sostatt til staðar longu frá 1685, og tørvurin á innovatión øktist, tá ið komið varð inn í upplýsingartíðina, og ikki minst, tá ið ídnaðarkollveltingin og kapitalistiska samfelagsskipanin tóku seg fram seinna helming av 18. øld.

Júst um hesa somu tíð doyði síðsti lensmaðurin og hirðstjórin í Íslandi, Henrik Bjelke, í 1683, og tá varð Ísland umskipað til amt, so umsitingin har samsvaraði við restina av einaveldinum. Trý nýggj embæti vóru sett á stovn. Tey vóru stiftamtmaður, amtmaður og landfúti, so skipanin minti nógv um ta norsku amtsskipanina. Fyrsti stiftamtmaðurin varð settur í 1684, og tað var yngsta barnið uttan fyri hjúnalag hjá Kristiani 5. kongi, sum æt Ulrik Christian Gyldenløve, sum varð settur í starvið.

Gyldenløve var tá bara fimm ára gamal, og tí er greitt, at hansara útnevning til stiftamtmann var meira ein symbolsk avgerð enn nakað annað. Hann var heldur ongantíð í Íslandi, og tað sama kann sigast um mestsum allar hinar stiftamtmenninar, sum vóru fram til 1770. Tí halda íslendskir søgufrøðingar, at hetta hægsta embætisstarv Íslands var mest eitt eiti fyrstu mongu áratíggjuni (Friðriksson og Þór 2013: 229). Fýra ár seinni varð fyrsti amtmaðurin í Íslandi settur. Hann æt Christian Müller og var sonur rentumeistaran Henrik Müller, sum hevði nógv áhugamál í íslendska handlinum. Amtmaðurin búði á Bessastøðum til 1694, men eftir tað vitjaði hann landið um summarið og hevði annars umboðsmenn í Íslandi at røkja sínar uppgávur (Friðriksson og Þór 2013: 230).

Instruktiónin hjá amtmanninum var fyrimynd fyri ta instruktión, sum Raben stiftamtmaður fekk í 1720 (Gustafsson 1985: 48).

Meðan alt hetta hendi aðra staðni í ríkinum, helt Fríðrikur Gabel fram sum amtmaður og lensharri í Føroyum. Síðst í 1680-unum gjørdi hann, sum vit skulu síggja í komandi kapitli, eina roynd at umleggja partar av føroyskum vinnulívi, men tað var ikki til frama fyri íbúgvarnar í amtinum, men meira til gagns fyri síni egnu persónligu áhugamál.

Í 1695 varð Fríðrikur Gabel geheimiráð, og eftir at Fríðrikur 4. hevði tikið við sum kongur í 1699, setti hann Gabel sum varastathaldara í Noregi og stiftamtmann í Aggerhus stift. Fríðrikur Gabel tók tá við sum hægsti maður í Noregi eftir Ulrik Frederik Gyldenløve, sum hevði verið stathaldari har síðani 1664. Tá bar sjálvandi til hjá honum at nýta heitið amtmaður, sjálvt um hann ikki skuldi verið amtmaður í Føroyum, men tað var heitið sum varastatshaldari, sum var hansara hægsta tign, og tí nevndi hann seg sjálvan varastatshaldari og „Guvernør over Færøerne“ í skjølum frá fyrstu árunum av 18. øld (Degn 1934: 160). Gabel flutti til Noregs í 1700, og har var hann, tá ið hann doyði í 1708 (Andersen 1964: 106). Árini sum varastathaldari man áhugi hansara fyri føroyska leni sínum hava verið meira avmarkaður, enn hann hevði verið frammanundan.

Í teimum týdningarmiklastu skjølunum Føroyum viðvíkjandi hesa tíðina báðumegin árið 1700 verður heitið amtmaður nýtt heldur enn lensmaður, og tað er týðiligt í fyriskipanini, sum Kristian kongur undirskrivaði 30. mai 1691, eftir at føroyingar enn eina ferð høvdu verið í Keypmannahavn og borið fram klagur. Í hesi fyriskipan fær „Voris Amptmand“ boð um saman við løgmanni at kunngera fyriskipanina á tingstøðum og har, tað annars var neyðugt, og í § 13 er ásett, hvussu almenna skipanin var skipað.

Fyri at kongur skuldi kunna fylgja við í, hvussu til stóð í landinum, skuldu løgmaður og fútin árliga lata fólk koma á ting og bera fram tað, sum tey høvdu at klaga um embætismenn og keypmannin. Teir skuldu so senda eina frágreiðing um kærurnar til amtmannin, sum síðani skuldi lata danska kansellinum frágreiðingina (*Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission, nedsat i Henhold til Lov af 13/3 1908* 1911: 56). Sostatt var amtmaðurin skipaður undir kongi og kansellinum, men omanfyri løgmann, fúta og aðrar embætismenn í Føroyum. Hann var tí eisini partur av almennu skipanin og ikki ein púra sjálvstøðugur lensmaður, sum ofta hevur verið hildið. Henda sama skipanin var eisini greið í teirri útgávuni av Seyðabrævinum, sum kongur kunngjørdi 2. apríl 1698, og øllum tí arbeiðinum, sum var gjørt frammanundan (*Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission, nedsat i Henhold til Lov af 13/3 1908* 1911: 62).

Tað hevur verið sagt, at tað, at Gablarnir fingu Føroyar í len fyri lívstíð, gjørdi, at Føroyar ikki kundu gerast partur av nýskipanini av amtunum í 1662, sí t.d. (Høgnesen 1968: 64), men við øllum teimum grundgevingunum, sum eru nevndar omanfyri, er lítið at ivast í, at Føroyar í hvussu er í eina tíð vóru roknaðar

sum eitt amt við amtmanni, amtsforvaltara og fúta. Tað er heldur einki í vegin fyri, at Føroyar umsitingarliga vóru skipaðar sambært amtsskipanini, sjálvt um Gablarnir varðveittu Føroyar sum len, tí tað tók tíð at flyta frá gomlu lensskipanini til nýggju amtsskipanina í øllum lutum kring alt ríkið, og broytingarnar hendu ofta, tá ið deyðin gjørdi, at útskifting var í høgu størvunum. Samstundis er eisini vert at minna á, at amtmansstarvið kundi hava ein fíggjarkostnað við sær fyri amtmannin, og nærliggjandi var at bøta um tann kostnaðin við at lata amtmannin hava bæði lenið og handilin. Møguliga er tað ein orsøk til, at Gablarnir fingu rættindini til Einahandilin í Føroyum júst í árinum 1662.

Tað órógvaði uttan iva, at amtmaðurin umframt sínar umsitingarligu skyldur bæði hevði Føroyar sum arvalen og allan tann føroyska handilin. Fyri samtíðarinnar føroyingar var tað í hvussu er torført at skilja ímillum ymisku uppgávurnar hjá Fríðriki Gabel, og gjøgnumgongdin omanfyri vísir mest av øllum, at tørvur er á at granska hetta tíðarskeiðið og umsitingarligu støðu Føroya nærri. Í hvussu er ber ikki longur til at siga, at orsøkin til, at Gablatíðin var so torfør, var, at Føroyar hildu fram sum len avskornar frá restini av donsku umsitingini, sum áhaldandi mentist og miðsavnaðist.

Umsitingarliga og politiskt hendu fáar serføroyskar broytingar í tíðini hjá Fríðriki Gabel eftir 1673, men nógvar rembingar vóru í vinnuligu viðurskiftunum og í handlinum, sum greitt skal verða frá í næsta kapitli. Ríkispolitiskt var ein avleiðing av Norsku lóg Kristians 5., at tingmannatalið skuldi økjast úr 36 upp í 48, og at størvini sum løgrættumenn skuldu ganga upp á skift millum allar búfastar menn í sýsluni. Tað merkti, at tingmenn høvdu færri royndir, og tí gjørdist tingið „ein veikari stovnur, sum hevði truplari við at hevda sín myndugleika mótvegis kongsins embætismonnum“ (Sølvará 2002: 52). Viknaða støðan hjá Løgtinginum og styrknaða støðan hjá embætisverkinum kom rættiliga til sjóndar, eftir at Fríðrikur Gabel var deyður 1708, og kongur og hansara menn árið eftir tóku við bæði handlinum og øllum øðrum viðurskiftum Føroyum viðvíkjandi.

## *3.5 Umskipanin 1709*

Tá ið pápin Fríðrikur Gabel var deyður, royndi sonurin Christian Carl Gabel at varðveita rættindi hansara í Føroyum, og hann skeyt m.a. upp, at bróðir hansara, Frederik Wilhelm, kundi gerast amtmaður, meðan hann sjálvur helt fram við handlinum. Hesum tóku hvørki kongur ella Rentukamarið undir við, og á ólavsøku 1708 endaði Gablatíðin, og teir fingu eitt ár at avgreiða handilsviðurskiftini (West 1985: 15). Eftir tað skuldi kongur sjálvur taka sær av bæði handli og umsitingini av Føroyum.

Meðan Fríðrikur Gabel var statshaldari í Noregi, gjørdi hann ikki nógv við at kunna miðfyristingina í Keypmannahavn um føroysk viðurskifti, tí myndugleik-arnir vistu eftir øllum at døma lítið um støðuna í landinum, sum teir nú skuldu

*Sonur Fríðriks Gabel, Christian Carl Gabel, royndi at varðveita gomlu rættindini í Føroyum til handil og len, men hvørki kongur ella Rentukamarið vóru áhugað í tí. (Mynd: wikicommons)*



stýra, og tí varð ein nevnd við trimum monnum útnevnd 18. mai 1709, sum hevði til endamáls at fara til Føroya at kanna, hvat kongur átti í landinum. Nevndarlimirnir vóru Jørgen Christian Klein, sum ein góðan mánað frammanundan varð útnevndur til fúta og keypmann í Føroyum, flotayvirmaðurin Rasmus Juel og føroyski løgmaðurin Johan Henrik Weihe. Serliga henda síðsta útnevningin hevur verið nýtt til at grundgeva fyri, at myndugleikarnir í Keypmannahavn høvdu sera avmarkaða vitan um Føroyar, tí hesin løgmaðurin hevði tá verið deyður í meir enn trý ár, og nýggi løgmaðurin æt Samuel Pedersen (West 1985: 16). Teir báðir donsku nevndarlimirnir skuldu fara við fyrsta skipsmøguleika til Føroya. Har skuldi nevndin beinanvegin loysa keypmannin og fútan úr starvi, so at tað var greitt, nær donsku myndugleikarnir tóku við stýringini av Føroyum. Allir hinir embætismenninir, sorinskrivari, løgmaður, yvirmaður á Skansanum og sýslumenn, hildu fram í størvum sínum (West 1985: 17). Eftir tað fór nevndin undir at gera ognir av ymiskum slag upp og viðgera møguligar klagur um tíðina undir Gablunum.

Úrslitið av øllum hesum arbeiðinum varð skrivað í eitt stórt álit, sum gevur eina góða lýsing av nógvum viðurskiftum í Føroyum í 1709 (Degn 1934). Hetta álitið verður mett at vera byrjanin á einum nýggjum tíðarskeiði í Føroyum, „in which control was for the first time firmly centralised in Copenhagen,“ og álitið gjørdist grundarlagið hjá umsitingini í fleiri áratíggju, og soleiðis gjørdist úrslitið av nevndararbeiðinum, at „the following century presented the appearance of quite remarkable stability.“ (West 1985: 31–32).



*Flotayvirmaðurin Rasmus Juel var nevndarlimur í nevndini, sum í 1709 fór til Føroya at kanna kongsins ognir í landinum. Hann teknaði í hesum sambandi hetta kortið av Føroyum og Havnar býi. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Meðan nevndin ferðaðist kring landið, bjóðaði danski kongurin 28. oktober 1709 Svøríki av, og úrslitið varð Stóra norðurlendska kríggið, sum vardi líka til 1720. Kríggið fekk stóra ávirkan á viðurskiftini í Føroyum, og m.a. verður roknað við, at tað var orsøkin til, at eingin amtmaður varð settur í Føroyum fyrr enn við krígslok. N. Andersen sigur, at Føroyar 18. mai 1709 vóru lagdar undir íslendska stiftamtmannin, sama dag sum nevnd varð sett at kanna ognirnar í Føroyum (Andersen 1964: 166), men tað eydnaðist ikki Rólandi Høgnesen at finna nakað skjal um tað í sínum kanningararbeiði á Ríkisskjalasavninum (Høgnesen 1968: 64). Tí helt hann, at N. Andersen varð villeiddur av, at C.F. Nielsen í handritinum „Den verdslige Stat efter Reformationen" skrivaði tað sama, og sambært Rólandi er C.F. Nielsen ein kelda, sum skal nýtast við fyrivarni (Høgnesen 1968: XXVI). Júst hetta kritiska fyrivarnið við C.F. Nielsen vísir N. Andersen til aðrastaðni í bók síni (Andersen 1964: 367), men hinvegin vísir hann ikki til C.F. Nielsen viðvíkjandi stiftamtmanninum, so tað er líka væl hugsandi, at teir báðir, N. Andersen og C.F. Nielsen, hava funnið fram til somu upprunakeldu, og at upplýsingin tí er meira eftirfarandi, sjálvt um Høgnesen ikki fann hana.

Formliga sæð er hetta áhugavert, tí um íslendski stiftamtmaðurin fekk Føroyar at umsita í mai 1709, og Gablarnir frammanundan honum eisini vóru amtmenn, so hevur føroyski amtsstovnurin eina søgu, sum røkkur óbrotin heilt aftur til stovnsetingina av amtum í danska ríkinum. Í praksis hevur tað minni at

*Álitið hjá nevndini gav eina góða lýsing av Føroyum í 1709, og tað gjørdist soleiðis dygt grundarlag hjá miðfyrisitingini í Keypmannahavn at arbeiða út frá.*



Kommissionsbetænkningen
1709—10
ang. Færøernes Tilstand ved Kongens
Overtagelse af Enehandelen
paa Færøerne.

A/S. „Færø Amtstidende"'s Bogtrykkeri, Thorshavn.
1934.

siga, tí íslendski stiftamtmaðurin, Ulrik Christian Gyldenløve, var admiralur í herflotanum, og tí hevði hann ein sera virknan leiklut í stóra norðurlendska krígnum. Fyrstu árini virkaði hann á sjónum sum admiralur, men seinni gjørdist hann leiðari á Admiralitetinum í Keypmannahavn, meðan Tordenskjold stóð á odda á sjónum. Gyldenløve doyði í Keypmannahavn 8. desember 1719. Alla hesa tíðina hevur uppgávan sum stiftamtmaður í Íslandi neyvan fylt nógv, og enn minni man admiralurin hava hugsað um, at hann eisini hevði fingið Føroyar at umsita, um upplýsingarnar omanfyri eru eftirfarandi. Óvissan, um ein amtmaður var í Føroyum ella ikki, vísir í øllum førum greitt, at staturin var veikur í Føroyum, og tí vildi staturin sambært ástøðinum hjá Eggertsson halda Føroyar avbyrgdar frá umheiminum.

Við einum fráverandi amtmanni kom fútin, Jørgen Christian Klein, sum eisini var keypmaður, at hava nógv vald, og eingin so múgvandi embætismaður var aftur í Føroyum, fyrr enn Føroyar fingu ein í landinum búgvandi amtmann (West 1985: 43). Sum fúti var Klein skattauppkrevjari, og hann tók sær av øllum fíggjarmálum, harumframt var hann almennur ákæri, stjóri á sjúkrahúsinum og skúlanum, ovasti á Skansanum og havnameistari (West 1985: 48).

Jørgen Christian Klein gjørdi eitt gott arbeiði sum fúti, men í oktober 1713 fór hann, uttan at hava fingið loyvi til tað, við síðsta skipinum av landinum fyri at vera í Danmark um veturin. Hetta fall ikki í góða jørð í Rentukamarinum, og fyrrverandi varafútin hjá Gabel, Diderich Marcussen, var skjótur at bjóða seg fram til at yvirtaka embætið. Hann beyð sær til at fáa 4 til 500 ríkisdálar meira

burtur úr til kongsins kassa, og um hann ikki megnaði at gera tað við at økja um inntøkuna við bótum ella við grind, skuldi hann sjálvur gjalda, tí størri trýst fór ikki at verða lagt á føroyingar (West 1985: 68). Størri inntøkur komu væl við hjá statinum, tí brúk var fyri hvørjum oyra til krígsførslu. Rentukamarið royndi at fáa Klein at yvirbjóða Marcussen, men endin varð, at Klein slapp at halda fram sum keypmaður, meðan Marcussen gjørdist nýggjur fúti. Sum slíkir komu teir báðir til Føroya 24. juli 1715 (West 1985: 69).

Diderich Marcussen hevði við sær instruktiónina, hann sum fúti hevði fingið 31. mai sama ár. Í henni fekk hann 33 greinir at halda seg til. Tær allarflestu snúðu seg um kongsins ognir, avgjøld og eftirlit við handlinum, men í grein 5 fekk hann boð um at halda eyga við øllum metalum og miniralum, sum kundu geva kongi eina inntøku, og hann skuldi eisini „i andre Maader særdeles ved Fiskeriet og Handelens Tiltagelse og Forbedring saavelsom til Landets Opkomst kunde være at Observere og Betenke.“ Sostatt sást eitt sindur til hugburðin um búskaparliga menning aftur í reglugerðini hjá fútanum, men sum heild var tað at halda skil á øllum viðurskiftum tað, sum fylti nógv mest.[8]

Við hesari gjølligu reglugerðini kundi tað sæð út til, at statsvaldið varð styrkt í oyggjunum, men fleiri dømi eru um, hvussu veikur Diderich Marcussen sjálvur helt seg vera sum fúta. Í brævi til Rentukamarið gramdi hann seg um fleiri ymisk viðurskifti. T.d. segði hann, at nógvir íbúgvar vóru „meget vrangvillige og fortrædelige“ til at føra fútan, tá ið hann ferðaðist embætis vegna. Fleiri vóru eisini „Halsstarrige og u-lydige og sammenhængige“, serliga tá ið grind var. Tá vóru tað ikki allir, sum bíðaðu eftir boðum frá fútanum, og so nógvur maløru r var við skrálan og buldran, at fútin ofta óttaðist fyri, at hann skuldi koma „læmmelæst til mit Huus igien.“ Tá hann so royndi at fáa tann seka revsaðan, bar ikki til at fáa nakað prógv, tí teir vóru „alle som et Complot“. Hann óttaðist fyri, at hann fór at fáa somu lagnu sum ein fúti, sum var í Suðuroy, meðan Kristian 4. var kongur. Hesin fútin varð steinaður í hel. Teir ringastu at fáast við vóru sambært Diderich Marcussen syðrugøtumenn. Teir høvdu árið fyri, tá ið grind var, noktað fyri at flyta fútan heim, sjálvt um hann var bæði vátur og troyttur. Eingin vildi læna honum bát og fólk, og tá ið hann so gav einum bónda „een Rap med min Stock, bliver Sambtl. saa eenstemmige, og een sagde om mig slaaer hand ihiel.“ Fútin var bangin, og um teir høgu harrarnir „icke tager mig i Forsvar maa jeg rejse med Livet i Hænderne“[9]. Sjálvt um fútin óttaðist fyri lívi sínum, svaraði Rentukamarið kølið, at tað kundi einki gera uttan prógv, men at tað í staðin mátti „Forfølge dem med Lands Lov og Ret for at bringe dem i frygt“, og so gjørdi kamarið ikki meira við tað málið[10].

---

8 TSS. Færø Amt. Protocol holden over Færø Begyndt Anno 1720. Skjal nr. 3. s. 9-27. „Instruction for Sign. Diderich Marchusen hvorefter hand Landfogdetienisten paa Færøe fra førstkommende May Dag 1715 hafver at forestaa og forvalte.“

9 TSS. Kopibók fútans. Bræv til Rentukamarið dagfest 21. september 1717.

10 TSS. Brøv til fútan, nr. 132, frá Rentukamarinum til fútan Didrich Marcussen dagfest 14. juli 1718.



*Diderich Marcussen føldi seg einsamallan og óttaðist fyri lívinum, tá ið hann skuldi fremja gerning sín sum fúti. Tað er eitt greitt tekin um, hvussu veikt statsvaldið framvegis var í Føroyum tíðliga í 18. øld.*

Henda søgan er eitt gott dømi um, hvussu avmarkaður kongsins myndugleiki var í Føroyum, og verður søgan um henda fútan fylgd víðari fram, er eisini greitt, at Rentukamarið var munandi meira áhugað í inntøkuni, sum fútin hevði lovað tí, enn tað var í teimum trupulleikunum, sum fútin hevði at dragast við. Diderich Marcussen megnaði ongantíð at gjalda tað, sum hann hevði lovað, og í 1722 noyddust hann og konan at fara til Danmarkar at royna at fáa skil upp á viðurskiftini. Meðan tey vóru í Danmark, doyði Marcussen, og konan, Eva Margrethe Robring, arvaði skuld hansara. Hon megnaði at fáa kong at strika tað mesta, og restina fekk hon goldið, eftir at nýggi fútin Jørgen-Frandz Hammershaimb hjálpti henni at krevja gamla skuld inn í Føroyum. Stutt eftir giftist hon við nýggja fútanum, so hon kundi halda fram sum fútafrúa (West 1985: 187).

## *3.6 Peter Raben verður stiftamtmaður*

Eftir at gamli stiftamtmaðurin Ulrik Christian Gyldenløve var deyður 8. desember 1719, skuldi ein nýggjur stiftamtmaður finnast. Fyri Ísland var hann í hvussu er ein nýggjur maður, meðan hann kann havi verið tann fyrsti rættiligi stiftamtmaðurin fyri Føroyar, tí ivasamt er, um Gyldenløve nakrantíð fekk Føroyar at umsita. Nýggi stiftamtmaðurin var Peter Raben admiralur, og íslendskir søgufrøðingar halda, at tað helst var góða samband hansara við Gyldenløve, sum gjørdi, at hann gjørdist stiftsamtmaður í Íslandi, eftir at Gyldenløve doyði (Friðriksson og Þór 2013: 269).

John F. West heldur, at ein onnur orsøk til, at Raben varð útnevndur til stiftamtmann, var, at kongur og hansara ráðgevar vildu hava ein annan sjóflota-




*Raben var fyrsti amtmaður, sum vitjaði í Føroyum. Hann vitjaði frá 29. august til 10. september 1720. Her liggur skip hansara „Søridderen" á Eystaru vág millum Tinganes og Skansan. (Mynd: Kongaliga bókasavnið)*

yvirmann enn Christian Carl Gabel, tí við hesum soninum hjá Fríðriki Gabel sum evsta myndugleika í Føroyum, fór tað at tykjast, sum um Gablatíðin helt fram (West 1985: 138). Hetta er ein áhugaverdur tanki, men lítið hugsandi er tað, at slíkar hugsanir um viðurskiftini í Føroyum hava avgjørt, hvør skuldi vera stiftamtmaður í Íslandi.

At tað var ein flotayvirmaður, sum gjørdist stiftamtmaður, var onki óvanligt í, tí kongur vildi upprunaliga hava persónar við hernaðarligari bakgrund í stiftamtmansstørvini, meðan amtmenninir ofta høvdu eina akademiska bakgrund (Pedersen 1998: 52). Rentukamarið hevði einki at siga í starvsetanini av nøkrum av teimum 17 stiftamtmonnunum, sum vórðu settir í tíðini millum 1706 og 1730 (Pedersen 1998: 150), men tað órógvaði Rentukamarið, at hernaðarovastar vórðu settir í amtmanspostar, tí teir kendu so lítið til sivila umsiting, og teir vóru tí heilt bundnir at sínum yvirordnaðu, sum í tí førinum var Krígsráðið (Pedersen 1998: 152).

Peter Raben var føddur í Haderslev í 1661, og hann hevði gjøgnum sína starvsleið í flotanum fleiri ferðir verið í hollendskari tænastu, men hevði eisini roynt seg í venetianskari og franskari tænastu. Í 1710 gjørdist hann varaadmiralur, og hann hevði týðandi leiklut í fleiri av týdningarmiklu sløgunum í Stóra norðurlendska krígnum (West 1985: 137–138).

Raben varð í brævi frá Fríðriki 4. kongi „beskiced og Forordnet" til at vera „stiftbefalingsmand" í Íslandi og Føroyum. Sum slíkur skuldi hann vera kongi líðin og trúgvur, og hann skuldi av allari megi forða fyri skaða og fordervi. Hann skuldi, so skjótt hann legði til merkis onkran vanda, boða frá, so at „voris Absolutum Dominium Souverainiteten og Arverettigheden over disse Riiger og Lande for os og efter vores dødelige afgang vores Retmessige Arve Successor udi

Regeringen u-foranderlig kand perpetuere og udi bestandig velsstand erholdes." Kongur álegði honum eisini, at hann fyrstu tíðina skuldi vitja londini eina ferð um árið og seinni annaðhvørt ár, har hann „grundeligen Observere woris Interesse samt landenes nytte og opkomst." Annars skuldi hann í øllum halda seg til ta reglugerð, sum hann fór at fáa frá Rentukamarinum[11].

Í hesum útnevningarbrævinum er greitt, at stiftamtmansins fremsta uppgáva var eitt sindur øðrvísi, enn hon var hjá donskum og norskum stiftamtmonnum, tí Raben skuldi tryggja, at londini framhaldandi vóru partur av kongsins arvarætti. Hini boðini um at ansa eftir skaða og forfalli og at tryggja, at kongur fekk so nógv burturúr, sum til bar, minna meira um instruktiónirnar hjá øðrum amtmonnum, og tað sama gera boðini um, at stiftamtmaðurin skuldi halda eyga við, hvat kundi koma londunum til gagns og menningar. Hesi síðstu boðini vóru, sum natúrligt var, knýtt at, at stiftamtmaðurin skuldi vitja londini og har seta seg inn í tingini. Raben vitjaði bara eina ferð, og ongin annar stiftamtmaður vitjaði í landinum, og tí kom hansara lutur í at virka fyri „landenes nytte og opkomst" ikki at fylla nógv. Tað var annars í Donsku Lóg frá 1683 ásett, at stiftamtmenninir árliga skuldu vitja keypstaðirnar, so teir høvdu betri innlit í tað, sum rørdi seg, og hesar vitjanir høvdu eisini við sær, at mótstøðan móti stiftamtmanninum hvarv, og stiftamtmaðurin eisini gjørdist verji og fortalari fyri keypstaðin, heldur enn at hann bara var eftirlitsmyndugleiki (Pedersen 1998: 251).

Instruktiónin hjá stiftamtmanninum var í 18 greinum. Grein 1 minti um boðini í útnevningarbrævinum, men har varð uppgávan at menna londini orðað soleiðis: „Alle Tider skal hand troeligen og Grundeligen overveje ja sig yderligst være angelegen, alt hvis disse voris Lande Iisland og Færoe kand komme til gavns og bæste sampt voris Intrader til forbedring, og derom i behøvende Tilfælde med voris Cancelie og Cammer Colligus Correspondere, saa intet efterlades". Henda orðingin, sum er tann, sum hevur serligan áhuga í hesi ritgerðini, sæst aftur í grein 1 í instruksunum hjá norsku amtmonnunum (Flo 2014: 19). Restin av instruktiónunum hava mest við eftirlit og lóg og landaskil at gera, men í síðstu grein, grein 18, stóð, at hann skuldi kunna seg um metal og mineral í Íslandi og Føroyum og skriva eina gjølliga frágreiðing um tað. Harumframt skuldi hann senda eina frágreiðing um alt, sum kundi koma ríkinum og londunum til gagns, og hann skuldi serliga leggja dent á, „hvad middel Fiskeriet og Handelen kunde tiltage og forbedres."[12]

Raben fekk boð um at vitja bæði í Føroyum og Íslandi sum skjótast, og longu ein mánað, áðrenn friðaravtalan millum Danmark og Svøríki var undirskrivað 3. juli 1720, fór hann av stað við fregattini „Søridderen". Raben fór fyrst til Íslands, har hann mestsum alla tíðina helt seg umborð á fregattini, meðan hon

11 TSS, Færø Amt. Protocol holden over Færø Begyndt Anno 1720, Litra A. Skjal 1, s. 1-2. „Bestallingsbrev.." dagfest 6. mars 1720.

12 TSS. Færø Amt. Protocol holden over Færø Begyndt Anno 1720, Litra A. Skjal 2, s. 2-9. „Instruction hvorefter.." Instruktiónin er undirskrivað av kongi 27. apríl 1720.



*Peter Raben hevði greiðar instruksir at arbeiða eftir sum stiftamtmaður. Her eru instruksirnar avritaðar í kopibók hansara. (Mynd: Tjóðskjalasavnið)*

lá í havnini á Hafnarfjørðinum, og embætismenn og aðrir komu so at fundast við hann umborð. Hetta var fyrstu ferð síðani 1662, at hægsti embætismaðurin í Íslandi vitjaði landið (Friðriksson og Þór 2013: 270).

Tá ið Raben fór úr Íslandi aftur, hevði „Søridderen“ 55 kistur fullar av handritum og brøvum umborð, sum Árni Magnússon hevði savnað nøkur ár frammanundan, og sum høvdu verið goymdar á Skálholti (Friðriksson og Þór 2013: 270). Hetta var grundsúlan undir tí, sum seinni gjørdist til Árnasavnið í Keypmannahavn, og við hesum dýrgripinum í lastini vitjaði stiftamtmaðurin á fysta sinni land sítt Føroyar 29. august. „Søridderen“ lá á Havnarvág frá 29. august til 10. september 1720 (West 1985: 141). Áðrenn Raben fór úr Keypmannahavn, fekk hann frá Rentukamarinum eitt langt bræv um ymisk viðurskifti, sum hann skuldi kanna, meðan hann var í landinum. Hetta vóru mest spurningar um handilin, men Raben skuldi eisini kanna kolið í Suðuroy, sum Rentukamarið hevði fingið kunnleika um[13].

Umframt sínar egnu kanningar og viðmerkingarnar, sum fútin og keypmaðurin høvdu til spurningarnar frá Rentukamarinum, fekk stiftamtmaðurin eisini fleiri brøv frá føroyingum, meðan hann var í landinum. Tey snúðu seg mest um, hvussu harðligir fútin og keypmaðurin vóru, og ymiska misnøgd við handilin og prísirnar har. Hesi brøv vóru viðgjørd, og stiftamtmaðurin royndi at gera tað, hann kundi, fyri at loysa trupulleikarnar, áðrenn brøvini vóru koyrd í

13 West hevur í bók síni greitt gjølliga frá hesi vitjanini, hvat endamálið var við henni, og hvørji úrslit komu burturúr (West 1985: 139–156).



*Raben stiftamtmaður hevði verið í Íslandi, áðrenn hann kom til Føroya. Við sær umborð hevði hann hópin av fornum handritum, sum Árni Magnusson hevði savnað í Íslandi. Hesi gjørdust seinni grundstuðulin í tí, sum gjørdist til Árnasavnið í Keypmannahavn. Hetta savn lá sostatt á Havnarvág í einar tvær vikur summarið 1720. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

skjalagoymsluna (West 1985: 146). At taka ímóti slíkum kærum var ein vanlig uppgáva hjá stiftamtmonnum, tí teir kundu viðgera tær nógv skjótari, enn um tær skuldu fara gjøgnum rættarskipanina (Pedersen 1998: 240).

Tá ið Raben kom aftur til Keypmannahavnar av ferð síni, gav hann kongi og Rentukamari frágreiðingar um tað, sum hann hevði eygleitt (West 1985: 155), og tey árini, hann var stiftamtmaður, royndi hann at arbeiða til frama fyri føroyingar. Hetta sást m.a. aftur í spurningunum um handilstakstirnar, sum vóru til viðgerðar í 1723, har hann hevði størri atlit til føroyingar, enn aðrir partar høvdu, sum hugsaðu meira um handilsins og kongsins kassa, sum greitt verður nærri frá í komandi kapitli. Har verður eisini víst á, at tað var sera torført at seta ætlaðar broytingar í verk, tá ið amtmaðurin ikki var staddur í landinum, og tað gjørdi ikki støðuna betri, at hann ongantíð aftur vitjaði Føroyar.

Raben doyði 29. september 1727, og tey síðstu árini nýtti hann nógva orku til eitt stríð ímóti Christian Carl Gabel. Sjálvt um báðir høvdu samband við Føroyar, so vóru teir eisini báðir admiralar og embætismenn í Søetaten, og stríðið teirra millum hevði einki við Føroyar at gera. Ein nevnd varð sett at kanna viðurskiftini hjá m.a. Gabel, og hann varð koyrdur frá, men av øðrum orsøkum enn teimum, sum Raben hevði klagað um. Ístaðin gjørdist hann stiftamtmaður í Ribe í 1725 (Topsøe-Jensen og Marquard 1935: 423).

J.H. Schrøter segði góð 100 ár eftir, at Raben hevði verið stiftamtmaður, at Raben greivi var ein virkin maður, og hann setti seg inn í búskapin í landinum og setti hol á kanningar av kolinum, øðrum ráevnum og landbúnaðinum. Tað fekk stjórnina at stremba eftir, at eitt økonomiskt selskab skuldi stovnast frívilliga, men tað kom tó ongantíð so langt (Schrøter 1836: 45).

Er hald í hesari metingini, vísir tað greitt, hvussu stóran týdning ein virkin stiftamtmaður, sum hevði sett seg inn í viðurskiftini, kundi hava. Tann eina stiftamtmansvitjanin í Føroyum sæst væl aftur í virkseminum hjá Raben, men so hvørt sum hann eldist og varð upptikin av heilt øðrum tingum, fánaði hugurin at fáast við føroysk viðurskifti. Ein onnur orsøk var, at umsitingin í Keypmannahavn hevði fingið væl betri tamarhald á viðurskiftunum í Føroyum í tíðini síðani 1709, og handilin var eisini farin at ganga betur. Tí er ongin orsøk til at ivast í, at John F. West hevur rætt, tá ið hann heldur, at „from 1725 to about 1760, government policy seems to have been to leave [Føroyar] well alone" (West 1985: 9).

## *3.7 Fimm stiftamtmenn afturat saman við Íslandi*

Eftir vitjanina hjá Raben í 1720 vitjaðu stiftsamtmenn neyvan aftur í Føroyum og Íslandi. Tí verður hildið, at tað er avmarkað, hvussu stóran týdning stiftamtmaðurin hevði, men brævaskifti var millum fútan í Føroyum, stiftamtmannin og Kansellíið, so ein ávísan fyrisitingarligan týdning hevði hann (Nolsøe og Jespersen 2004a: 115). Flestu søgufrøðingar, sum nevna stiftamtmenninar, siga bara, at hann búði í Keypmannahavn og neyvan nakrantíð vitjaði Føroyar (t.d. Høgnesen, 1968a, p. 64), og í fleiri ritgerðum um stjórnarsøgu Føroya, verða hesir stiftamtmenninir als ikki umrøddir. Tí er vitanin lítil um, hvat hesir stiftamtmenn gjørdu, og hvønn týdning teir høvdu. Ein kanning av hesum spurningum eigur at verða gjørd, men hon liggur uttan fyri karmarnar á hesi ritgerðini. Tað skal tó sigast, at tað við at hyggja í brøv til stiftamtmannin og kopibøkurnar hjá honum skjótt fæst ein kensla av, at her er ein óskrivað søga, sum hevur væl størri týdning, enn søgugranskingin higartil hevur givið henni.

Stutt kann nevnast, at eftir at Raben doyði í 1727, varð lensbarónurin Christian Gyldenkrone útnevndur til stiftamtmann 2. juli 1728. Christian Gyldenkrone var bara stiftamtmaður fyri Føroyar í hálvttriðja ár, tí 11. desember 1730 varð hann útnevndur til stiftamtmann fyri Viborg stift og amtmann fyri Hald amt. Meðan Gyldenkrone var stiftamtmaður í Føroyum, var hann eisini embætismaður á fíggjarøkinum.

Sama dag, sum Christian Gyldenkrone fór úr starvi, varð Henrik Ocksen settur í starv. Um hann vita keldurnar ikki nógv annað at siga, enn at hann var embætismaður í fíggjarmálum, til hann varð koyrdur frá í 1716. Eftir tað hevði hann einki alment starv, fyrr enn hann gjørdist stiftamtmaður fyri Ísland og Føroyar í 1730. Hann sat í hesum starvi til sín doyggjandi dag, sum var 9. september 1750[14].

14 Dansk Biografisk leksikon bind XII, s. 376.



*Christian Gyldenkrone var stiftamtmaður fyri Føroyar og Ísland árini 1727-1730. (Mynd: wikicommons)*

Eftirmaður Ocksens var Otto Mandrup Rantzau greivi, sum eisini var hægstarættarsakførari. Rantzau var upplýsingarmaður, og hann helt fleiri talur í Videnskabernes Selskab í Keypmannahavn. Harumframt hevði hann stóran áhuga í sjónleiki, og hann hevði ein týdningarmiklan leiklut í at fáa kong at verða verja hjá sjónleikarum. Sagt verður eisini, at sjálvt um hann ongantíð vitjaði økini, har hann var stiftamtmaður, so hevur hann „efterladt sig Mindet som en af dets virksomste og mest afholdte Styrere."[15] Hetta minnið er ikki at finna aftur í føroyskari søguskriving, men Rantzau var ávirkaður av fysiokratisku hugsjónini, og hann mundi hava sín leiklut í, at embætismenn eftir 1750 fóru undir at royna at fáa gongd á nýggjar vinnur í Íslandi (Friðriksson og Þór 2013: 428). Rantzau var stiftamtmaður til deyðadag sín 2. oktober 1768.

Stiftamtmaður eftir Rantzau var Christian Lebrecht von Proeck barónur. Hann átti plantagur í Vesturindisku oyggjunum, og tá ið kongur yvirtók oyggjarnar í 1755, gjørdist hann fyrsti guvernørur har 4. mars sama ár. Í 1766 varð hann koyrdur frá, tí staturin hevði brúk fyri einum virknari manni[16]. Tvey ár seinni, tann 1. november 1768, gjørdist hann stiftamtmaður fyri Ísland og Føroyar, og hann fekk boð um beinanvegin at fara til Íslands at vitja. Tað vildi hann ikki orsakað av „kontrært Klima", men longu 19. desember 1769 fór hann frá sum stiftamtmaður, tí hann var vorðin amtmaður fyri Københavns amt[17].

---

15 Dansk Biografisk leksikon bind XIII, s. 472.
16 Dansk Biografisk leksikon bind XIII, s. 303.
17 http://www.jmarcussen.dk/historie/hart/rejser/vesti/vestibiog.html#086




*Otto Mandrup Rantzau var stiftamtmaður fyri Føroyar og Ísland frá 1750 til hann doyði í 1768. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Myndugleikarnir vildu hava, at stiftamtmaðurin skuldi vera búsettur í Íslandi, og ein orsøk var uttan iva, at roynt var at seta gongd á nýskapan av íslendskum vinnulívi av ymiskum slag. Tí vóru boðini til ein nýggjan stiftmann greið. Hann skuldi flyta til Íslands. Nýggja stiftamtmannin funnu myndugleikarnar í Bergen, har Laurits Thodal hevði verið stiftamtsskrivari í nærum tvey ár. Thodal varð 23. januar 1770 útnevndur til stiftamtmann fyri Ísland og Føroyar (Høgnesen 1968: 65), og hann fór, so skjótt sum tað læt seg gera, til Íslands, har hann búsettist á Bessastøðum. Í Íslandi tók hann lut í teimum menningarátøkunum, sum gongd varð sett á hesa tíðina, og fyri hesa ritgerðina er tað serliga áhugavert, at hann saman við amtmanninum Ólafi Stephensen í 1774 gjørdi út eitt fiskiskip, sum skuldi eggja íslendingum til at taka kappingina upp við tey 300 til 400 fremmandu fiskiskipini, sum fiskaðu við Íslands strendur. Royndin hjá teimum miseydnaðist, men handilsstjórnin tók tráðin upp og fór undir stórt átak við nógvum skipum (Friðriksson og Þór 2013: 471). Thodal var eisini stiftamtmaður, tá ið Skaftáreldarnir fóru at goysa, og stórir partar av landinum vóru lagdir í oyði. Hann kom tí eisini at vera virkin í arbeiðinum hjá teimum nevndum, sum skuldu endurreisa landið, og soleiðis var hann við til m.a. at viðmæla at avtaka einahandilin í Íslandi (Friðriksson og Þór 2013: 484).

Stiftamtmaðurin fekk soleiðis, serliga eftir at hann var fluttur til Íslands, stóran týdning í arbeiðinum at lyfta Ísland inn í modernaða tíð, men fyri Føroyar var tað eingin fyrimunur, at stiftamtmaðurin búsettist í Íslandi, tí úr Íslandi megnaði hann ikki at taka sær av føroyskum málum (Høgnesen 1968: 65). Ástøðiliga kann sigast, at við at flyta stiftamtmannin til Íslands, styrktist staturin har, men ein avleiðing var, at staturin viknaði enn meira í Føroyum.

Hetta hendi um júst somu tíð, sum stóru nýskipanirnar fóru í gongd í Danmark, og tað er heldur eingin ivi um, at tað var júst í tíðini millum 1780 og 1810, at leikluturin hjá amtmanninum sum fólksins rødd yvir fyri miðfyrisitingini var í hæddini, tí hetta var tíðarskeiðið, sum javnan hevur verið nevnt tað opiniónsstýrda einaveldið (Pedersen 1998: 392). Við amtmanninum búsitandi í Keypmannahavn var torført at fáa hann at umboða fólksins rødd í Føroyum.

## 3.8 Føroyar undir Sælands stiftamtmann

Myndugleikarnir høvdu, longu áðrenn Thodal varð settur í starv, ásannað, at tað fór at verða torført at røkja føroyska partin av arbeiðinum haðani, tí í instruksunum, sum Thodal 15. mai fekk sum stiftamtmaður, stóð, at hann skuldi útnevna tveir mans til at taka sær av føroyskum viðurskiftum hansara vegna. Annar skuldi vera í Føroyum, hin í Keypmannahavn. Hammershaimb fúti fekk uppgávuna í Føroyum, og í Keypmannahavn skuldi kanselliráð Buschmann taka sær av føroyskum málum (Høgnesen 1968: 65). Fútin Wencelaus Hammershaimb var sonur Jørgen Frantz Hammershaimb, sum gjørdist fúti, tá ið Raben var stiftamtmaður, so fútaembætið hevði verið í somu ætt í nærum hálva øld. Buschmann var amtsforvaltari hjá Proeck amtmanni í Keypmannahavn, og sum slíkur hevði hann nógv annað at hugsa um enn viðurskiftini í Føroyum. Tí er lítil ivi um, at stiftamtmansins leiklutur í Føroyum viknaði av hesi umskipan.

Um somu tíð var eisini hugsanin um at seta ein amtmann í Føroyum fyri fyrstu ferð frammi í sambandi við, at eitt uppskot um at niðurleggja løgmansembætið varð viðgjørt. Henda hugsan varð tó skjótt slept aftur, tí tað fór at gerast ov dýrt fyri statskassan (Høgnesen 1968: 65). Men ein broyting hendi í 1773, tá ið Buschmann bað um at sleppa undan føroysku málunum, tí hann var vorðin amtsforvaltari í Odense og Rugård amtum.

Buschmann hevði gjørt arbeiðið ókeypis, men tá ið ein assessor Bang varð biðin um at taka uppgávurnar upp á seg, vildi hann ikki gera tað ókeypis. Vestindiske, guineiske Rente- og Generaltoldkammer bað hann samráðast við stiftamtmannin um, hvørja samsýning hann skuldi fáa. Thodal vildi ikki ganga við til, at hann skuldi løna sínum varafólkum í Føroyum og Keypmannahavn, og endin gjørdist, at uppgávan sum stiftamtmaður í Føroyum varð flutt til stiftamtmannin fyri Sæland.

Verandi stiftamtmaður, Knuth, noktaði at átaka sær uppgávuna, tí hann helt seg vita alt ov lítið um Føroyar, men eftir at hann doyði 26. februar 1776, varð eftirmaður hansara Brockenhuus 11. mars útnevndur til stiftamtmann í Sælands stifti og Føroyum og til amtmann í Roskilde og í Føroyum. Hann var sotatt bæði stiftamtmaður og amtmaður í Føroyum, men ongin ábending er um, at tað hevði nakra praktiska ávirkan. Høgnesen heldur, at hesar broytingar vóru gjørdar av „udelukkende praktiske hensyn“, tí tað var einki, sum talaði fyri, at



*Tá ið Henrik Adam Brockenhuus í 1776 varð útnevndur til stiftamtmann í Sælandi, gjørdist hann eisini bæði stiftamtmaður og amtmaður fyri Føroyar. Brockenhuus røkti størvini til 1787. (Mynd: wikicommons)*

ein stiftamtmaður fyri Sæland á nakran hátt skuldi havt fortreytir fyri at fáast við føroysk mál, soleiðis sum ein stiftamtmaður fyri Ísland hevði havt tað (Høgnesen 1968: 68). Uppgávan sum stiftamtmaður í Føroyum viknaði sostatt, og orsøkin var einans praktisk og fyri at spara eitt sindur av umsitingarútreiðslum. Statsins leiklutur var í øllum førum ikki styrktur í Føroyum, og tí slapp javnvágsfellan at halda fram.

At Brockenhuus umframt at verða útnevndur til stiftamtmann eisini varð settur sum amtmaður í Føroyum, hevur ikki verið umrøtt í føroyskari søgu, so torført er at meta um, hví hann varð tað, og hvønn týdning tað fekk. Sjálvt um tað møguliga ongan praktiskan týdning hevði, at stiftamtmaðurin nú hevði tveir hattar á høvdinum Føroyum viðvíkjandi, so má tað, at hann var amtmaður í Føroyum, onkursvegna eisini merkja, at Føroyar í 1776 vóru skipaðar sum eitt amt. Allir stiftamtmenninir fram til 1816 vóru bæði amtmenn og stiftamtmenn fyri Føroyar, men tá ið Bülow tað árið varð settur, varð einki nevnt um, at hann samstundis var amtmaður í landinum.

Meðan Brockenhuus sat sum amtmaður, vóru stórar nýskipanir gjørdar á fleiri økjum í ríkinum. Í 1735 var Kommercekollegium stovnað, sum hevði til endamáls at virka til frama fyri einum nýggjum búskaparligum politikki, har málið var at styrkja ríkisins búskap við at føra ein virknan vinnupolitikk (Pedersen 1998: 252). Stutt eftir kom landbúnaðarframleiðslan inn í eina hepna konjunkturgongd, sum hevði við sær, at landbúnaðarframleiðslan í Danmark áhaldandi øktist. Henda gongd gjørdi sítt til, at gongd varð sett á umfatandi nýskipanir í seinna helmingi av 18. øld, sum serliga fóru at merkjast í 1780- og 1790-árunum, eftir at krúnprinsurin Fríðrikur í 1784 tók valdið frá sálarsjúka

pápa sínum Kristiani 7. og setti nýskipanarhugaðar ráðharrar at stýra saman við sær. Í øllum hesum nýskipanunum fingu amtmenninir ein avgerandi leiklut í at fremja nýskipanirnar kring landið (Pedersen 1998: 265).

Týdningarmiklastu nýskipanirnar vóru útskiftingin av jørðini og avtøkan av hovarínum, sum við tíðini skuldi gera, at bøndur kundu eiga sín garð heldur enn at festa hann. Hesir reformar broyttu búskaparligu skipanina grundleggjandi, og størsta avleiðingin var, at aldagamla góðsskipanin datt sundur. Tað gjørdi so aftur, at tørvur var á einari nýggjari umsiting at taka sær av teimum uppgávum, sum góðseigararnir higartil mestsum sjálvstøðugt høvdu tikið sær av. Tað hevði so aftur við sær, at fleiri nýskipanir av fyrisitingini vóru framdar, og tað hevði stóra ávirkan á leiklutin hjá amtmonnunum (Pedersen 1998: 271). Karl Peder Pedersen hevði lýst hesa gongd sum, at „godsstavnsbåndet afløstes af et amtsstavnsbånd.“ (Pedersen 1998: 272).

Allar hesar nýskipanirnar gjørdu, at samfelagið var kollveltandi broytt síðstu árini av 18. øld. Amtmenninir høvdu havt avgerandi týdning fyri, at nýskipanirnar vóru gjøgnumførdar í hvørjum króki av landinum, og ein avleiðing var, at amtmenninir fingu fleiri nýggjar umsitingarligar uppgávur, sum góðseigarar áður høvdu tikið sær av. Sami danski søgufrøðingurin Karl Peder Pedersen svarar einum gomlum spurningi, sum ofta hevur verið settur um, hví eingin ógvuslig og blóðug kollvelting var í Danmark lík fronsku kollveltingini, soleiðis:

> Det er der sikkert flere forklaringer på, men jeg tror, at en af de vigtigste – og oversete – er, at man i datidens Danmark rådede over en stærk forvaltning, der havde god indføling med, hvad der rørte sig i befolkningen – som evnede at reagere – og som ikke mindst også var i stand til at garantere, at de nødvendige reformer blev sat i værk og gennemført på en for alle parter fuldt betryggende måde. At landets vigtigste regionale embedsmænd – amtmændene – her spillede en særdeles vigtig rolle, kan der ikke være tvivl om.

Amtmenninir gjørdust við øllum hesum nýskipanunum statsligir embætismenn heldur enn kongsligir tænarar (Pedersen 1998: 278). Samstundis gjørdi henda nýskipan, at tørvur varð á at styrkja amtmenninar fakliga, og tá var serliga talan um løgfrøðiliga útbúgving. Tørvur gjørdist á at skipa alla amtsskipanina av nýggjum, og tað hendi í 1793, tá ið sonevndi amtsreformurin varð settur í verk.

Ein av orsøkunum til, at ein nýskipan av amtsskipanini varð gjørd tá, hevði sín uppruna á Bornholm. Har gjørdist fyrrverandi føroyski løgmaðurin Thorkild Fjeldsted amtmaður í 1780. Hann helt, at hansara uppgáva sum amtmaður hevði so lítlan týdning, at amtmansembætið kundi avtakast. Á Bornholm hevði hernaðarliga verjan stóran týdning, og tí var sami maður bæði amtmaður og kommandantur har fram til 1739, og amtmansembætið hevði tí hoyrt undir ta hernaðarligu miðfyrisitingina. Atfinningar at Niels West, sum tá sat við báðum uppgávunum, gjørdi, at embætini vórðu sundurskild, men bara trý ár seinni eydnaðist tað Krígskancellínum at fáa eina standandi kommissión innførda

fyri oynna, sum kommandanturin, amtmaðurin, amtsforvaltarin og prósturin sótu í, og í hesi nevndini hevði kommandanturin avgerandi orðið. Tað var henda støða, sum gjørdi, at Thorkild Fjeldsted helt, at man tað sama kundi niðurleggja amtmansembætið og býta amtmansins uppgávur til nevndina og hinar nevndarlimirnar í henni (Pedersen 1998: 287). Fyri Rentukamarið var hetta ein kærkomin sparing, og tí tók tað undir við uppskotinum og avtók bornholmska amtmansembætið, men tað vísti seg skjótt at vera eitt vánaligt uppskot, tí nevndin megnaði ikki at semjast um teir spurningar, sum vóru lagdir fyri hana. Tí varð amtmansembætið innført aftur eftir seks ár við ongum amtmanni, og læran av hesi royndini var, at amtsskipanin var tann besta skipanin at loysa uppgávurnar (Pedersen 1998: 289).

Tann nevndin, sum varð sett at arbeiða við nýggjari amtskipan, hevði hesar royndirnar av Bornholm við sær, men tað voru serliga ójøvnu støddirnar á ymisku amtunum og ógreiða støðan millum stiftamtmenn og amtmenn, sum ítøkiliga gjørdu, at tørvur var á nýskipan. Niðri í Fraklandi vóru umfatandi nýskipanir gjørdar eftir kollveltingina 1789, og hesar broytingar góvu eisini íblástur til teir, sum arbeiddu við nýskipanini í Danmark. Tá ið Rentukamarið var klárt við nýggju amtsskipanini 6. august 1793, varð Danmark býtt sundur í 18 amt. Kongur tók undir við uppskotinum 4. september, og 21. juni 1794 varð nýggja amtsskipanin kunngjørd í plakat (Pedersen 1998: 296).

Við nýskipanini komu stiftamtmenn og amtmenn at standa á jøvnum føti. Stiftamtmaðurin var ein amtmaður við nøkrum serligum heimildum viðvíkjandi umsitingini av kirkjuligum viðurskiftum, men annars var bara navnið á muni. Navnið og tilknýtið til kirkjuna gjørdu kortini, at stiftamtmenn vóru hægri í tign, og tí komu hesi embætini eftir 1800 í stóran mun at virka sum størv við høgari tign, sum amtmenn kundu enda sína starvsleið í (Pedersen 1998: 301).

Sjálvt um nýskipanin varð undirskrivað í 1793, varð hon ikki sett í verk beinanvegin, tí broytingarnar hendu, so hvørt sum amtmenn fóru frá, og nýggir skuldu setast í staðin. Fyri Sælands stiftamtmann, sum eisini var amtmaður fyri Føroyar, hendu fyrstu broytingarnar í 1799, tá ið Johan Knuth fekk boð um at lata keypstaðirnar frá sær, so hvørt sum tað gjørdist viðkomandi. Samstundis fekk hann Keypmannahavnar amt at umsita, men noyddist at lata Roskilde amt frá sær. Ætlanin var annars at Roskilde og Keypmannahavn skuldu leggjast saman, men tað valdi Rentukamarið ikki at gera, og helst var orsøkin, at Knuth ikki var nakar serliga dugnaligur umsitari (Pedersen 1998: 298).

Ein partur av nýskipanini var at skriva nýggjar instruktiónir til amtmenninar, og fleiri uppskot vóru frammi. Onki av teimum varð kortini sett í verk, tí ásannað varð, at tíðin var farin frá instruktiónum. Instruktiónir gjørdust skjótt ov gamlar, tí nýggjar lógir alla tíðina løgdust afturat og broyttu arbeiðsøkið hjá amtmonnunum. Tí hevði tað størri týdning, at amtmenninir fylgdu teimum lógum, sum vóru galdandi, og fylgdu væl við í teimum broytingum, sum komu. Flestu amtmenn vóru longu løgfrøðingar, og við avgerðini um, at amtmenn ikki skuldu hava

serligar instruktiónir, øktist tørvurin enn meira á, at teir vóru løgfrøðiliga útbúnir (Pedersen 1998: 309). Skipanin av arbeiðinum á amtsskrivstovuni var framvegis heilt upp til tann einstaka amtmannin, og tí var stórur munur á umsitingini í teimum ymisku amtunum (Pedersen 1998: 313).

## *3.9 Nýskipanir merkjast í Føroyum*

Meðan stóru nýskipanirnar vóru í Danmark, og leikluturin hjá amtmonnunum broyttist og styrktist aðrastaðni í ríkinum, var amtmansskipanin verandi fjar og veik í Føroyum, og Føroyar fingu tí ikki líka stóran lut í nýskipanunum sum aðrir partar av ríkinum. Um somu tíð viknaði løgmansembætið eisini. 18. øld er løgfrøðiliga merkt av, at føroyska lógarøkið viknaði, og vanligar danskar lógir vórðu tinglisnar í Føroyum, uttan at atlit varð tikið til serstøku viðurskiftini í landinum. Frá 1790 vóru „de for de danske stater i almindelighed gældende anordninger“ sendir til Føroya (Høgnesen 1968: 17).

Tí gjørdist løgmaður gjøgnum alla 18. øld alsamt meir og meir ein kongligur embætismaður, og leikluturin hjá Løgtinginum gjørdist minni og minni, og í seinnu helvt av 18. øld vórðu nærum eingir løgtingsdómar avsagdir longur (Sølvará 2002: 58). Tá ið Hans Jacobsen Debes doyði í 1769, tók íslendski sakførarin, Þorkell Jónsson Fjeldsted, sum seinni var amtmaður á Bornholm, við løgmansembætinum, og tá varð alt samband millum føroysku stórbóndastættina og løgmansstarvið kvett (Nolsøe og Jespersen 2004a: 113). Í 1772 gjørdist Fjeldsted amtmaður í Finnmørkini, og seinni gjørdist hann eisini stiftamtmaður í Tróndheimi. Tá varð norski løgfrøðingurin Jacob Bentzon Hveding løgmaður, og tá ið hann legði frá sær í 1786, varð ein annar norskur løgfrøðingur, Johan Michael Lund, settur í starvið.

Felags fyri hesar var, at løgmansstarvið var ein liður í teirra starvsleið fram móti hægri størvum, og Lund løgmaður droymdi heilt frá byrjan av um at fáa annað løgmansstarv í Noregi. Tað kom fram í samskifti hansara við nýggja stiftamtmannin, Gregers Christian Haxthausen, sum 21. februar 1787 av kongi varð útnevndur til „stiftsbefalingsmand over Sjællands stift og Færøerne samt til Amtmand over bemeldte Færøer.“ [18]. Haxthausen helt, at tað var sera torført at røkja starvið sum amtmaður í Føroyum, tá ið hann var so langt burturi frá landinum. Hann hevði tí tosað við Lund og spurt, um hann kundi átaka sær uppgávuna. Tað var Lund sinnaður til, um hann kundi fáa lyfti um, at hann fekk næsta tøka løgmansstarvið í Noregi, um hann valdi at søkja um tað (Høgnesen 1968: 69).

Haxthausen skeyt upp at flyta stiftsamt- og amtmansuppgávurnar fyri Føroyar til Tróndheim ella Bergen stift, men Rentukamarið gekk ikki við til tað, tí einki

18 TSS. Færø Amt. Stiftamtmandsskrivelser ca. 1780 – ca. 1806. Bræv frá Haxthausen stiftamtmanni dagfest 3. apríl 1787.



*Gregers Christian Haxthausen var stiftamtmaður og amtmaður fyri Føroyar frá 1787 til 1790. (Mynd: wikicommons)*

beinleiðis samband var millum Noregi og Føroyar. Tá ið Rentukamarið ikki gekk við til hetta uppskotið, skeyt stiftamtmaðurin upp, at partar av uppgávunum hjá amtmanninum Føroyum viðvíkjandi vórðu lagdar til Lund løgmann. Stiftamtmaðurin vísti til skipanina á Bornholm (Høgnesen 1968: 69).

Rentukamarið hevði onga heimild at avgera nakað viðvíkjandi norskum løgmansstørvum, men tað bað stiftamtmannin sjálvan konstituera løgmannin til at taka avgerðir í málum, sum høvdu skund. Hvat víðari hendi í málinum, er ógreitt, men hildið verður, at Lund, sum var løgmaður frá 1788, til hann fór úr starvi í 1804, tók sær av ávísum amtmansuppgávum (Høgnesen 1968: 70).

Haxthausen varð statsministari í 1789, og í 1790 fór hann frá sum stiftamtmaður á Sælandi og amtmaður í Føroyum. Eftir hann tók Johan Heinrich Knuth greivi við størvunum, og hann gjørdist í 1799 eisini amtmaður í Keypmannahavn. Knuth átti tvey greivadømi, Gyldensten á Fyn og Knuthenborg á Lollandi (Pedersen 1998: 358). Ábendingar eru um, at Lund løgmaður helt fram sum fulltrúi hjá amtmanninum tey 12 árini, Knuth var stiftamtmaður, og at hann eisini nýtti Hammershaimb fúta sum fulltrúa í Føroyum.

Ein orsøk til, at tað gjørdist neyðugt hjá stiftamtmanninum at hava fólk at røkja uppgávur fyri seg í Føroyum var, at allar nýskipanirnar í ríkinum merktust aftur í Føroyum við ymiskari nýggjari lóggávu. Ein slík lóg var lógin um forlíksnevndir, sum varð sett í verk í 1795. Henda lógin varð tvey ár seinni eisini sett í verk í Noregi, og stiftamtmaðurin sendi longu 1. juli 1797 nøkur eintøk av forlíkskommissionslógini í Noregi til Føroya og vildi hava hana almannakunngjørda. Í lógini varð stiftamtmanninum álagt at útnevna forlíkskommiserar og býta landið í forlíksøki. Hann ásannaði, at hann ikki kundi vita so nógv um landið og tess íbúgvar, sum teir embætismenn, sum búðu

Greivin Johan Heinrich Knuth var stiftamtmaður og amtmaður fyri Føroyar frá 1790, til hann andaðist í 1802. (Mynd: wikicommons)



har, og tí bað hann løgmann og fúta taka sær av uppgávuni. Hann sá fram til at hoyra tíðindini um, at nevndirnar vóru farnar at virka, so hann kundi senda kansellínum frágreiðing, soleiðis sum honum varð álagt í lógini[19].

Í einari klagu frá Begtrup presti og sundsbóndanum frá 1803 stendur, at fútin og løgmaður vóru fulltrúar hjá stiftsamtmanninum, og at teir sum slíkir útnevndu stevningarvitni til forlíksnevndina. Hetta varð broytt, tá ið ein nýggj kunngerð frá 1796 varð lýst í 1799, tí tá gjørdist tað uppgávan hjá sorinskrivaranum at útnevna stevningarvitni[20]. Her sær í hvussu er út til, at tað vóru fútin og løgmaðurin í felag, sum tóku sær av uppgávum amtmansins, sum hann ikki sjálvur kundi røkja, tí at hann ikki var staddur í Føroyum.

Ábendingar eru um, at Lund løgmaður ikki var væl lýddur í Føroyum, og at tað serliga var vantandi rættartrygd, sum fekk føroyingar at ressast við. 18. mai 1790 skrivaðu nakrir eysturoyingar undir eina klagu, har teir søgdu, at løgmaður „spiller nær ved hele Landet". Fólk vóru sera væl nøgd við tann setta sorinskrivaran, men á vártingi í Vágum hevði løgmaðurin lopið á hann við ákærum av ymiskum slag, og hann hevði tikið starvið frá honum. Eingin annar varð settur í hansara stað, og tí vóru vártingini ikki hildin, og tá løgmaður goymdi seg á Steigargarði, bar heldur ikki til at halda løgting, og tað var til stóran skaða fyri rættartrygdina. Stórur partur av fólkinum hevði ongantíð sæð løgmann av tí sama. Undirskrivararnir vildu tí sleppa av við henda løgmannin, og teir bóðu um, at setti fútin, Joen Christiansen, tók sær av at halda vártingini, og teir vildu hava Joen Weyhe at taka við løgmansstarvinum. Teir, sum undirskrivaðu,

19 TSS. Færø Amt. Stiftamtmandsskrivelser ca. 1780 – ca. 1806. Bræv frá Knudt stiftamtmanni dagfest 1. juli 1797.

20 TSS. Færø Amt. Stiftamtmandsskrivelser ca. 1780 – ca. 1806. Bræv frá Jacob Bærentsen og Joachim Begtrup dagfest í Sandagerði 10. oktober 1803.

vónaðu, at stiftamtmaðurin fór at taka sær av málinum, tí kom skil ikki á „er at frygte for Oprør i Landet“[21].

Heldur ikki í Rentukamarinum vóru tey væl nøgd við Lund løgmann. Hansara búskaparligu uppskot høvdu ikki imponerað Rentukamarið (Høgnesen 1968: 73), og í heila tikið tykjast viðurskiftini millum løgmannin og Rentukamarið at hava verið vánalig. Helst var tað orsøkin til, at Lund løgmaður, meðan hann var staddur í Keypmannahavn í 1802, vendi sær til Danska kansellíið við einum uppskoti um at seta eina nevnd at gera uppskot til fleiri broytingar og ábøtur í Føroyum. Danska kansellíið vendi sær til Rentukamarið við uppskotinum og mælti til, at nevndin var samansett av føroysku embætismonnunum, og at ein av nevndarlimunum skuldi fáa útinnandi myndugleikan hjá amtmanninum. Rentukamarið skrivaði eitt svar, sum ongantíð varð sent avstað. Í svarinum søgdu teir, at kamarið ikki tók undir við uppskotinum hjá Lund løgmanni. Rentukamarið hevði ringar royndir av øðrum uppskotum hjá løgmanni, og kamarið helt ikki, at lokalu embætismenninir vistu so nógv um lokalu viðurskiftini, burtursæð frá Hammershaimb fúta. Royndirnar av eini slíkari nevnd høvdu eisini verið vánaligar á Bornholm, og tað var fútin, sum átti at hava útinnandi myndugleikan (Høgnesen 1968: 72–73). Longur kom hetta málið ongantíð, og hugsandi er, at tað var orsakað av, at stiftamtmaðurin, Knuth greivi, kom í trupulleikar júst hesa tíðina.

Eina várnátt í 1802 var Knuth greivi farin á hest sín í fullum stiftamtmansuniformi og dýrandi fullur. Hann reið gjøgnum Keypmannahavn, og skjótt fór ein hali av rópandi gøtudreingjum at renna aftan á honum. Hetta gjørdist ein stór gøla, og stutt eftir, 6. juli 1802, doyði Knuth greivi, og hildið verður, at henda óhepna hendingin átti sín lut í tí (Pedersen 1998: 352). Tað gekk skjótt fyri seg at skifta amtmenn út, tí longu 23. juli varð Frederik Hauch útnevndur (Pedersen 1998: 324). 49 ára gamli Hauch kom úr einum starvi sum stiftamtmaður í Bergen, og hann varð fyrsti útbúni løgfrøðingurin í tí starvinum (Pedersen 1998: 358).

Hauch skrivaði 2. august 1802 til løgmann Lund og boðaði honum frá, at hann var settur sum stiftamtmaður fyri Sæland, Føroyar og Bornholm, umframt sum amtmaður fyri Keypmannahavnar amt og Føroyar. Hann vendi sær til løgmans og vónaði, at hann fekk hansara álit og „Fortrolighed“, og hann fór við „redelig og nidkier Medvirkning til Haandhævelse og Fremme af Ret, Orden og almenn Nytte“ at gera seg fortjentan til tað [22].

Stutt eftir, at Hauch hevði tikið við, vendi hann sær til Rentukamarið fyri at spyrja, hvør kundi átaka sær tær uppgávurnar, hann hevði sum amtmaður í Føroyum. Honum varð víst til fútan Hammershaimb, og hann hevði tí skrivað til hansara og spurt, um hann vildi átaka sær tær uppgávurnar hjá amtinum, sum

---

21 TSS. Færø Amt. Stiftamtmandsskrivelser ca. 1780 – ca. 1806. Brævið er undirskrivað av Niels Pedersen, Simon Augustinussen, Niels Johannesen og Christian Jacobsen á Glyvrum 18. mai 1790. Løgmaður møtti ikki á tingi á ólavsøku, og tí hava fleiri skrivað undir upp á sama skjal um, at teir vildu hava endurgjald fyri ferð og tíðarspillu.

22 TSS. Færø Amt. Stiftamtmandsskrivelser ca. 1780 – ca. 1806. Bræv frá Hauch til løgmann dagfest 2. august 1802.

*Frederik Hauch var fyrsti løgfrøðingurin, sum var stiftamtmaður og amtmaður fyri Føroyar. Tað var hann árini 1802 til 1810. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



„ikke taaler det Ophold som ved en skrivtlig Correspondence herom med mig ikke kunde undgaaes." Seinni fekk hann skriv frá løgmanni dagfest 30. september, har løgmaður helst boðaði frá, at undanfarni amtmaður hevði sett løgmann at taka sær av slíkum uppgávum. Tað gjørdist einki við tað, nú hann hevði biðið fútan, men hann bað løgmann føra tey mál, sum hann var farin undir, til enda og boða fútanum frá avgerðum í teimum[23].

## 3.10 Løbner verður amtmaður

Hammershaimb fúti var gamal maður, tá ið Hauch tók við sum stiftamtmaður, og tí vildi stiftamtmaðurin hava ein annan mann at átaka sær uppgávuna sum amtmaður í Føroyum. Í 1805 gjørdist sonur fútans, Jørgen Frantz Hammershaimb, løgmaður, og tað var helst óheppið, at faðir og sonur umsótu amtmansuppgávurnar í felag. Sorinskrivarin Olsen var „en højst uefterrettelig mand", og tí var bara Løbner kommandantur eftir, sum kundi átaka sær uppgávuna. Fyri ikki at særa gamla fútan, vóru Løbner og Hammershaimb fúti settir í embætið sum amtmaður í felag. Teir komu sostatt at virka sum eitt „amtmandsskab" (Høgnesen 1968: 71).

Stutt eftir endaði Danmark í kríggi, og tað gjørdi sítt til, at serliga Løbner í størri og størri mun fór at virka sum ein veruligur amtmaður fyri Føroyar. Ein gjøgnumgongd av samskiftinum hjá Rentukamarinum í tíðarskeiðnum 1806 til 1815 vísir, at samskiftið var beinleiðis millum amtmenninar í Føroyum og

23 TSS. Færø Amt. Stiftamtmandsskrivelser ca. 1780 – ca. 1806. Bræv frá Hauch til løgmans dagfest 26. mars 1803.



*Werner Moltke var stiftamtmaður og amtmaður fyri Føroyar árini 1810 til 1816. Hann var tann seinasti, sum var bæði stiftamtmaður og amtmaður fyri Føroyar.*
*(Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Rentukamarið, og í stóran mun gekk tað tí uttan um stiftamtmannin. Sama gjøgnumgongd vísir, at tað serliga var Løbner, sum virkaði sum amtmaður í Føroyum. Hetta við at Hammershaimb og serliga Løbner vóru farnir at virka sum veruligir amtmenn, var helst hent í árunum 1806-8, tá ið Hauch framvegis var stiftamtmaður (Høgnesen 1968: 71).

Hauch gjørdist í 1810 stjóri í postverkinum, og tá yvirtók Werner Moltke amtmansstørvini. Hann hevði verið stiftamtmaður í Ribe síðani 1796, men upprunaliga var hann heryvirmaður, og hann hevði sostatt onga løgfrøðiliga útbúgving. Moltke var amtmaður til 1816, tá ið hann gjørdist yvirforseti í Keypmannahavn (Pedersen 1998: 359). Moltke stiftamtmaður ásannaði í brævi 8. apríl 1815, at eingin virðing var fyri hansara uppgávu sum amtmaður í Føroyum, tí alt samskifti millum miðfyrisitingina og føroysku embætismenninar gekk uttan um hann. Hann hevði tí hugsað um at taka heimildirnar hjá Hammershaimb og Løbner aftur, men gekk frá hesum ætlanum aftur.

Tað var helst hesin veruleikin, at teir báðir fulltrúarnir hjá stiftamtmanninum vóru farnir at virka púra leysir av stiftamtmanninum og á tann hátt í veruleikanum virkaðu sum sjálvstøðugir amtmenn, sum fekk Rentukamarið til at venda sær til Finanskollegiið 1. mars 1815. Spurningurin hjá kamarinum var, um fíggjarkollegiið vildi gjalda tann meirkostnað, sum tað hevði havt við sær fyri kongsins kassa, um Løbner varð settur sum veruligur amtmaður. Grundgevingarnar hjá Rentukamarinum vóru, at skansin í Havn var lagdur í oyði undir krígnum, og tað fór at gerast ov kostnaðarmikið at byggja hann uppaftur. Tí var ikki brúk fyri einum kommandanti longur, men av tí, at Løbner og fútin undir krígnum høvdu víst „udmærket konduite", bar illa til bara at koyra teir frá. Harumframt hevði Løbner vunnið sær góðan kunnleika um føroysk viðurskifti, og tað fór tí at

verða gagnligt fyri Føroyar, um hann helt fram at stjórna viðurskiftunum. Góða ávirkanin hevði verið uppaftur størri, um Løbner ikki einans virkaði sum fulltrúi hjá stiftamtmanninum. Tí var Rentukamarið komið til, at tað hevði týdning at seta Løbner í starv sum landsins hægsti sivili myndugleiki. Fíggjarkollegiið tók 13. mars undir við uppskotinum (Høgnesen 1968: 74).

Nakrar dagar seinni skrivaði Rentukamarið til stiftamtmannin. Brævið byrjaði við orðunum: „Conjuncturerne i de senere Aaringer have vist Vigtigheden af, at paa Færøerne ansættes en høieste civil Øvrighedsperson, som efter Embeds Medfør kunde have Authoritet til at foranstalte hvad i forekommende uforudsigelige Tilfælde fornødiges." Fulltrúarnir hjá stiftamtmanninum kundu ikki átaka sær somu ábyrgd, sum teir høvdu kunnað, um teir vóru settir av kongi. Harumframt var samskiftið seint við eitt so fjarskotið land. Rentukamarið legði afturat, at kommandanturin hevði biðið um at avtaka skansan, og tí umhugsaði Rentukamarið at biðja kong seta eina amtmann í Føroyum, so at ein embætismaður var, sum hevði hægri tign enn fútin og sorinskrivarin. Kamarið vildi hava stiftamtmansins hugsan at vita[24].

Stiftamtmaðurin tók ikki undir við uppskotinum, tí hann helt, at verandi embætismenn megnaðu at geva honum nóg nógvar upplýsingar til, at hann kundi taka sær av amtmansuppgávunum. Hann mælti heldur til, at ein løgfrøðingur við amtmansheimildum varð sendur til Føroya í eini tvey, trý ár. Hansara uppgáva skuldi vera at skipa amtið. Annars vónaði hann at varðveita embætið, so leingi sum tað ikki kundi prógvast, at hann hevði gjørt okkurt lógarbrot (Høgnesen 1968: 75).

Meira hendi tí ikki í málinum, men tá ið Moltke gjørdist yvirforseti í Keypmannahavn 22. mai 1816, bar til at taka spurningin uppaftur. Fyrst skuldi ein nýggjur stiftamtmaður finnast, og tað var lættari sagt enn gjørt. Tíðirnar vóru truplar búskaparliga, tí við krígnum komu nøkur hørð kreppuár, og allir teir góðseigararnir, sum kundu koma upp á tal sum stiftamtmenn, stríddust fyri at sleppa undan húsagangi (Pedersen 1998: 328). Fyri slíkar menn var tað ein útreiðsla at gerast amtmaður, og tað var helst orsøkin til, at eingin umsøkjari var til starvið í fyrstu syftu. Tí var neyðugt at tvinga onkran at taka við starvinum (Pedersen 1998: 321).

Maðurin, sum var settur í starvið, var tann 46 ára gamli Kristoffer Schøller Bülow, sum bæði gjørdist amtmaður í Keypmannahavn og stiftamtmaður fyri Sæland. Bülow var sonur amtmannin í Skanderborg, og hann hevði sum ungur løgfrøðingur arbeitt í Rentukamarinum síðani 1795. Haðani fór hann í kanselliið, har hann gjørdist stjóri fyri norska departementið. Eftir friðin í Kiel varð henda deildin niðurløgd, og hann fekk eina tíð bíðipengar. Bülow varð føddur í 1770, og 22 ára gamal leyk hann útbúgving sum cand. jur. (Pedersen 1998: 359).

24 TSS. Færø Amt. Færøe Copie Protocoll over kongelige Befalinger etc.etc. Bræv nr. 30/1815. Bræv frá Rentukamarinum dagfest 25. mars 1815.

Fýra dagar áðrenn Bülow varð settur, 2. juli 1816, skeyt Rentukamarið upp at seta ein amtmann í Føroyum. Grundgevingarnar vóru, at Føroyar vóru so fjarskotnar, og nú var tað ikki longur ráðiligt, at hesar embætisuppgávurnar vórðu røktar av einum avloysara. Rentukamarið mælti tí til at seta Løbner kommandant í starv sum fyrilbilssettur amtmaður. Umsitingin av stiftamtsuppgávunum skuldi tó framvegis vera hjá stiftamtmanninum fyri Sæland, tí Sælands biskupur var eisini biskupur í Føroyum (Høgnesen 1968: 75). Óhugsandi er tað ikki, at ein orsøk til, at Løbner varð settur, var, at Bülow treytaði sær, at hann vildi sleppa av við onkrar av uppgávum sínum, um hann skuldi taka við starvinum um stiftamtmaður.

Bülow varð settur í starv 6. juli 1816 (Bloch 1895: 5), og 23. juli skrivaði Rentukamarið til „Den constituerede Amtmand over Færøe hr. Maior von Løbner“:

> Ved allerhøeste Resolution, dateres 6. D. M. Har det Allernaadigst behaget Hans Maistæt Kongen at udnævne Kammerherre og Cancelliedeputered Chr. Sch. Bülow til Stiftamtmand over Sjællands Stift, Bornholm og Færøerne, samt til Amtmand over Kiøbenhavns Amt, hvorhos hans Majestæt tillige Allernaadigst har bemyndiget os til, at constituere herr Majoren til at bestyre Amtmands Forretningerne over Færøerne indtil det nærmere maatte blive Allernaadigst bestemt, hvorledes med disse Forretninger bliver at forholde for Eftertiden. –
>
> Thi bliver hr. Major von Løbner herved indtil videre constitueret til at bestyre de Amtmands Embedet over Færøerne vedkommende Forretninger, hvilke hr. Majoren vilde behage at communisere Embedsmændene, samt øvrige vedkommende paa Færøe til fornøden Efterretning. – Iøvrigt forbeholde vi os nærmere at underrette Dem om, hvorledes de Amtmands Embedet over Færøerne vedkommende Protocoller og Brevskaber, der i Anledning af Allerhøistbemte Resolution maatte bleve at adskille fra Kiøbenhavns Amts Archiv siden kunde blive til Dem overleverede.[25]

Sjálvt um Løbner bara var settur amtmaður, so hevði hann allan myndugleika hjá amtmonnum, og tí ber til at siga, at amtmansembætið við hesari avgerðini varð flutt til Føroya. Eitt annað prógv fyri hesum er, at Bülow ikki varð nevndur amtmaður í Føroyum, eins og undanmenn hansara høvdu verið. Bara tveir mánaðir frammanundan hesari setan hevði kongur eftir ráðum frá danska kansellínum avgjørt, at Løgtingið skuldi niðurleggjast, og revsimál skuldu eftir tað leggjast fyri Hægsta rætt, og borgarlig mál skuldu fyri kongliga Landsoverrets samt Hof- og Stadsrættin í Keypmannahavn, um ynski var um at royna tey á hægri rættarstigi. Tinglýsing og aðrar jurisdictio volutaria uppgávur skuldu flytast frá Løgtinginum til sorinskrivaran[26].

25 TSS. Færø Amt: Ordrebog 1806-1824, nr. 76. Bræv frá Rentukamarinum til Løbner, settan amtmann, dagfest 23. juli 1816.

26 TSS. Panteprotokol 1813-1818 PP 354-55 (ophævelse). Plakat nr. 4.



*Emilius Marinus Georgius Løbner, kommandantur á Skansanum, gjørdist fyrsti amtmaður, sum var búsettur í Føroyum. Hann varð útnevndur til fyribilssettan amtmann 23. juli 1816, samstundis sum Kristoffer Schøller Bülow varð settur sum stiftamtmaður. Tá ið Frederik Lowsow í mars 1821 avloysti Bülow sum stiftamtmaður, varð Løbner 27. mars 1821 útnevndur til veruligan amtmann í Føroyum. (Mynd: Tjóðsavnið)*

Danska kansellíið tók stig til at avtaka Løgtingið um somu tíð, sum Rentukamarið tók stig til at seta ein sjálvstøðugan amtmann í Føroyum, og tað hevur víst seg at vera torført at finna annað samband ímillum hesar báðar avgerðir, enn at tær vóru tiknar um somu tíð. Nakað beinleiðis samband nýtist ikki at vera ímillum hesar báðar avgerðir, tí avgerðirnar vóru bara staðfestingar av einum veruleika, sum var íkomin við tíðini. Setanin av Løbner kommandanti sum settum amtmanni var staðfesting av, at hann og Hammershaimb fúti í veruleikanum í fleiri ár høvdu virkað sum amtmenn uttan um stiftamtmannin, og avtøkan av Løgtinginum var ein staðfesting av, at hesin aldagamli stovnurin í mong ár hevði havt ein støðugt minkandi týdning. Hesar báðar avgerðirnar kunnu tí best síggjast sum staðfesting av, at statsins vald í Føroyum var støðugt økt, og í 1816 var løtan komin til at staðfesta henda veruleika.

Róland Høgnesen heldur, at persónligu ambitiónirnar hjá Løbner kommandanti høvdu stóra ávirkan á, at hann varð settur sum amtmaður í Føroyum, og at Føroyar á tann hátt fingu eina valdsmikla miðfyrisiting. Løbner royndi so seint sum í august 1813 at fáa eitt embæti í Danmark, men henda veturin hálsaði hann um og fór at arbeiða fyri at blíva útnevndur til amtmann í Føroyum í staðin. Tað bar honum serliga væl til, meðan hann var staddur í Keypmannahavn veturin 1814-15. Sambært hesari áskoðan trýsti Løbner Rentukamarið við at hótta við at fara av landinum. Gjørdi hann tað, skuldu øll tey trý ovastu embætini í Føroyum setast av nýggjum fólkum um somu tíð, og tað „ville frembringe den allerstørste uorden", sum Løbner skrivaði í brævi dagfest 3. november 1813 (Høgnesen 1968: 77). Høgnesen hevur víst á, at bæði í Rentukamarinum og í Kansellínum vóru teir sera væl nøgdir við virksemið hjá Løbner í Føroyum. Tí kemur hann til ta niðurstøðu, at tað serliga var ynskið hjá Rentukamarinum at

varðveita Løbner sum hægsta embætismann í Føroyum, sum fekk Rentukamarið til at skjóta upp at seta ein amtmann í Føroyum (Høgnesen 1968: 80).

Henda niðurstøðan hjá Høgnesen er í tráð við yvirskipaðu niðurstøðu hansara um, at einki bendir á, at danska stjórnin hevði nakran tilvitaðan politikk Føroyum viðvíkjandi. Hann fann onga ábending um ein slíkan greiðan politikk í tilfarinum, hann gjøgnumgekk, og tí lýsir hann danska politikkin sum „den i øjeblikket mest praktiske løsning.“ (Høgnesen 1968: 82) Sambært Høgnesen var tað ynskið hjá Løbner, sum setti gongd í málið, og hansara vilji setti dám á, heilt til hann endaliga varð útnevndur til amtmann í 1821. Høvuðsniðurstøða hansara er tí, at vantandi tilvitaður politikkur gjørdi, at tær mest praktisku loysnirnir vórðu valdar, og tí kom tað í stóran mun at verða tilvildin, sum avgjørdi, hvørjar avgerðir vórðu tiknar (Høgnesen 1968: 83).

Hesum loyvi eg mær at ivast í, og seinni í niðurstøðuni tykist Høgnesen eisini at mótsiga sær sjálvum, tá ið hann sigur, at avtøkan av Løgtinginum og stovnsetanin av amtmansstovninum var ein natúrlig avleiðing av teirri menningini av statinum, sum fór fram hesi árini (Høgnesen 1968: 85). Menningin av danska statinum merktist áhaldandi í Føroyum, sjálvt um tað væl kann vera, at Føroyar viðhvørt vóru síðsti partur av ríkinum, sum merkti broytingar. Sjálvt um avgjørt var at gera stórar umsitingarliga broytingar í t.d. amtmansskipanini, so merktust tær ikki, fyrr enn ein nýggjur amtmaður skuldi finnast fyri ein fráfarnan. Soleiðis var støðan m.a. við amtsreforminum frá 1793, og soleiðis var støðan eisini, tá ið Føroyar vórðu lagdar undir Sælands stiftamtmann í 1786. Tí er tað í tráð við amtmanssøguna sum heild, at týdningarmiklu árstølini í føroysku amtmanssøguni samsvara við, nær nýggjur maður gjørdist stiftamtmaður fyri Sæland. Umsitingarligar broytingar vóru umrøddar, og ætlanir lagdar millum amtmansskiftini, men tað er týðiligt, at broytingarnar hendu, tá ið nýggjur amtmaður skuldi finnast. Tað er helst eisini orsøkin til, at Løbner ikki var settur sum veruligur amtmaður fyrr enn í 1821.

Valið av Bülow sum stiftamtmanni vísti seg skjótt at gerast eitt óheppið val, tí hann rendi seg skjótt í stórar trupulleikar. Bülow átti harragarðin Nordfeldt á oynni Møn og nakað av góðsi í Holsteini. Tá ið vanligu inntøkurnar av góðsinum í Holsteini ikki komu í 1818, endaði Bülow í stórum fíggjarligum trupulleikum. Hann noyddist at lýsa seg sjálvan konkurs, og um somu tíð bað hann kong finna ein avloysara fyri seg sum stiftamtmann og amtmann. Avloysarin gjørdist Frederik Lowsow, men Bülow varðveitti løn sína. Fíggjarligu trupulleikarnir fingu Kanselliið til at kanna embætisførsluna hjá Bülow, og tá kom undan kavi, at hann síðani á sumri 1817 hevði tikið 12.000 ríkisdálar úr ymiskum kassum til egna nýtslu. Her var talan um so álvarsligt embætisbrot, at ákæra varð reist í Landsover- samt Hof- og Stadsretten. Tá ið løtan kom, at rætturin vildu avhoyra Bülow, var tó eingin maður at finna. Bülow var saman við soni sínum tíðliga í februar 1820 flýddur av landinum, ílatin sum „jæger Olsen“. Hann búsetti seg

í Hamburg, har danska rættarskipanin ikki kundi gera nakað við hann, og har búði hann til deyðadag sín í 1830 (Frisk Jensen 2013: 187).

Frederik Lowsow varð føddur í 1788 og var av einari borgarligari keypmannahavnskari embætisfamilju. Hann varð cand. jur. í 1809, og tvey ár eftir tað gjørdist hann amtmaður í Laurvig, har hann var, til hann fekk starv í hægstarætti í 1814. Eftir at hann hevði avloyst Bülow í nøkur ár, varð hann settur í embætið sum stiftamtmaður yvir Sælands stift og amtmaður í Keypmannahavn 24. mars 1821 (Bloch 1895: 6). Starvssetanin av Lowsow fekk avgerandi týdning fyri søguna um Færø amt, tí tveir dagar, áðrenn Lowsow varð settur í starv, mælti Rentukamarið til at seta Løbner í starv sum amtmann í Føroyum, og 27. mars skrivaði Fríðrikur kongur undir setanarbrævið, sum var soljóðandi:

> Vi Frederik den Sjette, af Guds Naade konge til Danmark, de Vender og Gothers, Hertug til Slesvig, Holsten, Stormarn, Ditmarsken, Lauenborg og Oldenborg,
>
> Gjøre vitterligt: at Vi allernaadigst have beskikket, og forordnet, ligesom Vi og herved forordne og beskikke den hidtil constituerede Amtmand for Vort Land Færø, Major Os elskelig Emilius Marinus Georgius Løbner, Ridder af Dannebrogen og Kommandant paa bemeldte Vort Land Færø, som haver de i Indfødsretten fastsatte Egenskaber til herefter at være tillige Vor virkelige Amtmand sammesteds. Thi skal han være Os, som sin absolute og Souveraine Arvekonge og Herre, efter derforuden hans allerunderdanigste Pligt og Skyldighed lydig, huld og troe; Vores og Vort kongelige Arvehuuses Gavn og bedste med største Flid søge vide og ramme; al Utroskab, Skade og Fordærv derimod af yderste Magt og Formue hindre, forekomme og afværge; saa og, hvis han fornemmer, at skee til vores Projecter, Os strax, uden nogen Undseelse tilbørligen aabenbare og give tilkjende; saa at Vort absolutum dominium, Souverainitet og Arve-Rettighed over dette Vort Arve-Rige og underliggende Lande, for Os og, efter Vores dødelige Afgang, Vore retmæssige Arve-Successorer i Regjeringen uforanderlig kan perpetueres og erholdes i bestandig Velstand. Isærdeleshed skal han sig i samme bestilling med største Flid og Vindskibelighed lade finde, og i alle Maader rette sig efter den Instruxtion, som ham tillagt vorder, saa og i det øvrige troeligen forrette, hvis han Tid efter anden af Os eller Vore Collegier paa Vor Vegne og til Vor Tjeneste anbefales, og sig deri, saavelsom i alle andre Maader saaledes skikke og forholde, som det en ærekjær Amtmand og Kongelig troe Tjener egner og vel anstaaer, han og agter at tilsvare og vil være bekjendt efter den allerunderdanigste Troeskabseed, hans Os derpaa aflagt haver. For hvilken hans Tjeneste Vi allernaadigst have bevilget ham at maa nyde det, som ham nu er, eller herefter maatte vorde tillagt, hvilket saaledes skal vedvare, indtil Vi anderledes derom tilsige. Iøvrigt skal denne Vor Bestalling ikke give ham adgang til at udøve nogen Kalds- eller Birkeret, hvortil han ellers ikke, i Overensstemmelse med Forordningen af 3de Juni 1809 kunde være berettiget.

Hvorefter de vedkommende sig allerunderdanigst have at rette. Givet i Vor kongelige Residentsstad Kjøbenhavn, den 27de Martii 1821.[27]

Bara tveir mánaðir, áðrenn Løbner fekk starvsbræv sítt, varð tað í skipanini um løgfrøðilesnað frá 26. januar 1821 ásett, at bara tey, sum høvdu fult løgfrøðiprógv kundu koma upp á tal, tá ið embæti sum amtmaður og stiftamtmaður skuldu setast. Kongur kundi kortini framvegis sjálvur útnevna fólk uttan løgfrøðiprógv til embætini, men sambært Karl Peder Pedersen hendi tað ongantíð (Pedersen 1998: 319). Tí má tað undra, at Rentukamarið mælti til at seta Løbner sum amtmann og enn meira, at kongur tók undir við hesum tilmælinum. Rentukamarið ásannaði í tilmæli sínum, at Løbner onki løgfrøðiligt prógv hevði, men tað metti, at drúgvu royndir hansara í starvinum vigaðu upp ímóti vantandi próvnum (Høgnesen 1968: 76).

Fyrstu løgfrøðingarnir fingu størv sum amtmenn í Noregi í ávikavist 1740 og 1751 (Pedersen 1998: 194), og fyrsti løgfrøðingurin, sum gjørdist amtmaður í Danmark, var Hans de Hofman, sum gjørdist amtmaður í 1773 (Pedersen 1998: 277). Nýggi universitetsfundatsurin frá 1788 bannaði Rentukamarinum at skjóta upp persónar uttan løgfrøðiligt embætisprógv til embætið sum stiftamtmaður (Pedersen 1998: 318). Í 1790 vóru 29 % av amtmonnunum løgfrøðingar, í 1810 var talið komið upp á 56 %, og stutt áðrenn 1830 vóru 95 % av øllum amtmonnum løgfrøðingar. Í tíðarskeiðnum 1790-1810 var helvtin av nýsettum amtmonnum løgfrøðingar. Í 1810-árunum høvdu 86 % av teimum nýsettu løgfrøðiligt prógv, men eftir 1820 var eingin settur, sum ikki hevði slíkt prógv (Pedersen 1998: 353). Meðan tað fyrr hevði verið vanligt, at amtmenn høvdu hernaðarliga bakgrund, kom tað ongantíð fyri eftir 1830. Løgfrøði var vegurin til amtmansstørv, og tíð var ikki til hernaðarlig síðuspring (Pedersen 1998: 354).

At løgfrøðiligt prógv kravdist at røkja amtmansembætið, var ein avleiðing av øllum nýskipanunum síðstu áratíggjuni av 18. øld, og tí ber til at siga, at tað vóru amtmenn við hesari bakgrund, sum skuldu seta allar nýskipanirnar í verk kring alt ríkið. Nýskipanirnar gjørdu, at arbeiðsuppgávurnar hjá amtmonnunum vuksu nógv í árunum millum 1790 og 1830 (Pedersen 1998: 367), millum annað tí, at talið á lógum øktist í stórum.

Róland Høgnesen gjørdi í ritgerð síni eina uppteljing av lógum og kunngerðum, sum vóru tinglisin í Føroyum. Hann kom fram til, at tað frá 1686 til 1789 vórðu tinglisnar 80 lógir, og 14 av teimum vóru um serlig føroysk viðurskifti. Í tíðini frá 1790 til 1812 vóru 69 lógir tinglýstar, men eftir at S. Sevel hevði tikið við sum sorinskrivari, kom ordilig gongd í tinglýsingarnar, tí tey seks árini frá 1813 til 1819 vóru 299 lógir og kunngerðir tinglýstar í Føroyum (Høgnesen 1968: 18). Høgnesen kom til ta niðurstøðu, at „det var den almindelige tendens til at lade lovgivning omfatte flere og flere områder og flere og flere detaljer, der

27 TSS. Færø Amt. Ordre-Bog nr. 2 begyndt fra 27. apríl 1805 endt 9. februar 1828. Nr. 183. Bræv frá Rentukamarinum dagfest 10. mai 1821.

på denne måde trængte ind i det færøske lovområde.“ (Høgnesen 1968: 18). Sevel sorinskrivari ivaðist í reglunum fyri kunngerðing av lógum í Føroyum, tá ið hann gjørdist sorinskrivari í 1812. Hann heitti á kansellíið um at fáa greiðari reglur, og úrslitið varð ein kanselliplakat dagfest 23. mars 1813, sum álegði sorinskrivaranum at halda eykating í sýslunum, so skjótt nýggir lógir og kunngerðir komu til landið, sum hann so kundi kunngera á hesum eykatingum (Christiansen 1998: 112). Sostatt skuldi hann kunngera allar lógir, sum vórðu sendar honum, og tað er helst orsøkin til, at so nógvar lógir og kunngerðir vórðu kunngjørdar frá 1813 til 1819. At danski kongurin um somu tíð misti Noreg við friðinum í Kiel, gjørdi helst eisini sítt til, at myndugleikarnir fingu størri áhuga fyri føroyska samfelagnum.

At allar danskar lógir og kunngerðir, eisini tær sum als ikki vóru viðkomandi fyri Føroyar, soleiðis vórðu tinglisnar, gav seinni trupulleikar, tí ivamál vóru um, hvørt allar hesar lógir nú eisini í veruleikanum vóru galdandi. Líknandi trupulleikar vóru eisini aðrastaðni í ríkinum, t.d. bæði í Vesturindisku oyggjunum og í Íslandi, og eftir viðgerð í umsitingini í Keypmannahavn avgjørdi kongur í resolutión 6. juni 1821, at framyvir hevði danska kanselíið heimild til at fáa vanligar danskar lógir tinglýstar í Vesturindisku oyggjunum, Føroyum og Íslandi, um samskifti við annaðhvørt Rentukamarið ella ovastu lokalu myndugleikarnar vísti, at eingin ivi var um, at lógirnar kundu nýtast í økinum (Høgnesen 1968: 28).

Lóggávuvaldið var hjá kongi, men við resolutiónini frá 6. juni 1821 gjørdist tað danska kanselíið, sum tók stig til at seta lógir í gildi í Føroyum, meðan Rentukamarið og hægsti lokali myndugleikin í Føroyum vóru ráðgevarar hjá kansellínum. Nú var eingin ivi longur um, hvørjar lógir vóru galdandi í Føroyum. Umframt lógir, sum vóru gjørdar serliga til Føroyar, vóru vanligar danskar lógir galdandi, um danska kanselliið í resolutión hevði avgjørt tað, ella kongur við resolutión hevði broytt lógir, sum bara við broytingum kundu brúkast í Føroyum. Vanligar danskar lógir høvdu ikki gildi í Føroyum, fyrr enn annaðhvørt danska kanselíið ella kongur tóku avgerð um tað, og tað kann illa tulkast øðrvísi enn, at talan var um sjálvstøðuga lóggávu fyri Føroyar, og at Føroyar sostatt vóru eitt sjálvstøðugt løgdømi (Høgnesen 1968: 30).

Kansellíið spurdi stutt eftir Løbner, um fýra lógir frá 1820 vóru egnaðar at seta í gildi í Føroyum. Amtmaðurin svaraði, at hesar lógir longu vóru tinglýstar og tí vóru í gildi. Tá ið kanselliið í 1823 spurdi, hvussu donsku lógirnar frá 1822 egnaðu seg at seta í verk í Føroyum, vísti Løbner amtmaður í svari sínum, at hann ikki enn hevði skilt nýggju skipanina. Tí noyddist Kansellíið í skrivi 4. oktober 1823 at greiða frá nýggju mannagongdini og áleggja amtmanninum at fylgja henni, áðrenn lógir vórðu tinglýstar. Tá kom skil í, og talið á tinglýsingum av donskum lógum minkaði (Høgnesen 1968: 28). Hetta kann illa síggjast øðrvísi enn sum eitt greitt dømi um, at tørvurin á einum amtmanni við løgfrøðiligari útbúgving var stórur.



*Ein grundgeving fyri at útnevna Løbner til amtmann var, at starv hansara sum kommandantur á Skansanum hevði lítlan týdning, eftir at bretar løgdu Skansan í oyði í 1808. Í hesum skiftinum broyttu kommandanthúsini eisini navn til amtmanshúsini. Ein dóttir Pløyens átti í síni tíð henda málningin, so soleiðis sóu amtmanshúsini helst út, tá ið Pløyen var amtmaður 1837-1848. (Mynd: Jákup Dahl)*

Ein onnur broyting í uppgávunum hjá amtmonnunum hesa tíðina var, at amtsrepartitiónskassar vórðu stovnaðir í øllum amtum í 1819. Uppgávan hjá hesum kassum var at taka sær av kommunalum útreiðslum, og tað skuldi m.a. gerast við at áleggja skatt á jørðina. Í Danmark verður mett, at sjálvt um kommunurnar ikki vórðu stovnaðar fyrr enn fleiri ár seinni, so ber til at siga, at amtskommunan við amtmanninum sum einaráðandi varð sett á stovn við amtsrepartitiónsgrunninum (Pedersen 1998: 378). Færø amt fekk eisini ein amtsrepartitiónsgrunn, sum Løgtingið fekk ábyrgdina av, tá ið tað varð stovnað í 1852. Henda økta fíggjarliga ábyrgdin gjørdi tørvin á einum væl útbúnum amtmanni uppaftur týðiligari.

## *3.11 C.L. Tillisch fyrsti amtmaður við løgfrøðiligari útbúgving*

1. juli 1825 varð ein nýggjur amtmaður, C.L. Tillisch, sum hevði útbúgving sum løgfrøðingur, settur sum avloysari hjá Løbner amtmanni. Tað er ikki eydnast at finna nakra ábending um, at hetta amtmansskiftið hendi, tí at miðfyrisitingin ynskti at gera hesa broyting, ella at hon hevði samband við uppgávuna hjá amtmanninum at skula ummæla allar danskar lógir og meta, um tær egnaðu seg

at seta í verk í Føroyum. Sambært almennu skjølunum hendi amtmansskiftið, tí at Løbner 24. september 1824 vegna heilsutrupulleikar søkti um at sleppa eina ferð til Danmarkar árið eftir. Tað gav kongur honum loyvi til, um Løbner læt ein embætismann í Føroyum røkja uppgávur sínar fyri seg upp á egna ábyrgd[28], og í trý ár varðveitti Løbner løn sína sum amtmaður, meðan Tillisch røkti starv hansara sum avloysari[29]. Sjálvt um einki prógv er funnið fyri tí, tykist tað mær ivasamt at siga, at tað bara var tilvildin, sum vildi tað so, at hernaðarliga útbúni amtmaðurin fór í sjúkrafarloyvi, og ein við løgfrøðiligari útbúgving varð settur at avloysa hann um júst somu tíð, sum løgfrøðiligu krøvini til amtmannin øktust í stórum.

Kansellíið fylgdi fyrstu árini mannagongdini frá 1821, men í 1826 varð generalprokurørurin, kendi danski løgfrøðingurin A.S. Ørsted, tikin við í viðgerðina, og sama ár vendi danska kansellíið sær til hægstu myndugleikar í Føroyum og Íslandi, áðrenn tað spurdi Rentukamarið, tá ið lógirnar frá 1815-1819 skuldu viðgerast. Tá ið Kansellíið í 1830 skuldi hava viðmerkingar til lógirnar frá árinum fyri, vendi tað sær fyrst til generalprokurørin, og síðani fekk amtmaðurin lógirnar til ummælis. Ikki fyrr enn amtmaðurin hevði svarað, varð Rentukamarið spurt (Høgnesen 1968: 29). Í veruleikanum merkti henda broytta mannagongd, at amtmaðurin gjørdist lóggávustigtakari saman við Kansellínum (Høgnesen 1968: 30). At amtmaðurin fekk vald til at ávirka, hvørjar lógir skuldi galda í Føroyum, og hvørjar ikki, hevur gjørt, at hann hevur verið samanborin við ein varakong (Thorsteinsson 1990: 44). Føroyski amtmaðurin var tí í einari serligari støðu í mun til sínar donsku starvsfelagar, tí hann hevði løgfrøðiliga ábyrgd av einum sjálvstøðugum lógarøki, har hann eisini kundi skriva uppskot til nýggjar lógir.

Ein avleiðing av, at løgfrøðiliga væl útbúnir amtmenn vórðu settir, sum m.a. skuldu gera metingar um, hvørt danskar lógir vóru egnaðar at seta í gildi í Føroyum, var, at embætismannaveldið varð styrkt. Staturin fekk eina nógv sterkari støðu í Føroyum. Samstundis var full ferð sett á eina broyting av, hvørjir embætismenninir vóru. Áðrenn 1800 vóru flestu embætismenninir føroyingar ella danir við sambandi til Føroya, og fyri teir flestu var embætið í Føroyum eitt lívstíðarstarv. Eftir 1800 gjørdust føroysku embætini í nógv størri mun ein liður í starvsleiðini hjá donskum embætismonnum, sum annars einki samband høvdu við føroyska samfelagið. Høgnesen hevur víst á, at ein avleiðing av hesi gongd var, at føroyska samfelagið í alsamt størri og størri mun varð knýtt tættari at Danmark, m.a. tí at nýggju embætismenninir vóru sera lojalir móti danska statinum. Føroyar sum sjálvstøðugt løgdømi kámaðist burtur við somu ferð, sum Føroyar politiskt vórðu meir og meir integreraðar í donsku skipanina (Høgnesen

28 TSS. Færø Amt. Ordrebog nr. 2 frá 27. apríl 1805 til 9. februar 1828. Bræv nr. 243. Bræv frá Rentukamarinum dagfest 23. desember 1824.

29 TSS. Færø Amt. Ordrebog nr. 2 frá 27. apríl 1805 til 9. februar 1828. Bræv nr. 282. Bræv frá Rentukamarinum dagfest 24. mars 1827.



*Christian Ludvig Tillisch avloysti í 1825 Løbner sum amtmaður í Føroyum. Tillisch var fyrsti amtmaður við løgfrøðiligari útbúgving, og tey fimm árini, hann var amtmaður, fór av álvara at merkjast, at gongd varð sett á at modernisera Føroyar.*
*(Mynd: Kongliga bókasavnið)*

1968: 86), og tað fekk stórar avleiðingar, tá ið pláss skuldi finnast fyri Føroyum í danska eindarstatinum, eftir at grundlógin varð samtykt í 1849.

Nýggi amtmaðurin Christian Ludvig Tillisch var systursonur Poul Christian Stemann, sum í 1827 gjørdist stjóri í Danska Kansellínum. Hann hevði tá í eini 30 ár verið amtmaður í Sorø. Hann varð roknaður sum tann besti amtmaðurin í Danmark, og tí fekk hann við tíðini ávirkan langt út um amtið, og hann fekk stóra ávirkan á, hvussu amtmansstarvið varð skipað í 19. øld eftir allar broytingarnar síðst í 18. øld. Umframt at vera stjóri í Danska Kansellínum virkaði hann eisini sum forsætisráðharri og løgmálaráðharri, og hann var ein av týdningarmiklastu embætismonnunum í Danmark, fram til einaveldið varð avtikið í 1848 (Wang 2008: 46). Tí var tað eisini hann, sum í 1848 á altanini á Christiansborg kunngjørdi, at Christian 8. var deyður, og at Fríðrikur 7. var nýggjur kongur. Hvørja ávirkan tað hevði á Føroyar, at teir báðir brøðurnir C.L. Tillisch og F.F. Tillisch, sum vóru amtmenn frá 1825 til 1837, høvdu eitt gott samband við ovastu leiðsluna í miðfyrisitingini, er ikki kannað, men uttan týdning hevur tað neyvan verið. Í hvussu er hava hesir báðir brøðurnir sum teir fyrstu í einum nýggjum ættarliði av amtmonnum havt góða atgongd til íblástur um, hvussu samtíðarinnar samfelag skuldi síggja út, og hvussu tað skuldi stýrast.

At amtmansstarvið við C.L. Tillisch skifti ham og skjótt fór at standa á odda í strembanini eftir at modernisera føroyska samfelagið, merktist skjótt, og tey fimm árini, hann var amtmaður, vóru á mangan hátt kollveltandi. Til hesa ritgerðina er hansara tíð sum amtmaður ikki kannað til fulnar, men greitt er, at C.L. Tillisch m.a. tók stig til at umskipa herdeildina á Skansanum til eitt jekaralið, hann var stigtakari til at stovna Færø Amts Bibliotek í 1828, og árið eftir hevði hann avgerandi leiklut í at grundleggja Færø Amts Skolefond og byggja Færø Amts

*Tillisch brøðurnir vóru systursynir Poul Christian Stemann, sum var stjóri í Danska Kansellínum. Stemann hevði fleiri týdningarmikil embæti og politisk størv síðstu einaveldistíðina. (Mynd: wikicommons)*



Hospital. Á tann hátt var hann við til at leggja lunnar undir bæði skúlaverkið og sjúkrahúsverkið, og óneyðugt er helst at siga, at hesir báðir almennu geirarnir líka síðani hava havt avgerandi týdning fyri menningina av samfelagnum.

C.L. Tillisch gjørdist í 1830 amtmaður fyri Åbenrå og Løgumkloster, og í 1841 gjørdist hann kamarskrivari, eins og Christoffer Gabel smá 200 ár frammanundan eisini hevði verið, og sum slíkur fekk hann stóra ávirkan á Christian 8. kong. Tað man helst ikki vera ósannlíkt, at hann onkuntíð brúkti hesa ávirkan sína til at ávirka føroysk viðurskifti.

Frederik Ferdinand Tillisch avloysti bróður sín C.L. Tillisch sum amtmaður í Føroyum. Hann helt fram, har bróðurin slepti, og eitt nú megnaði hann longu í 1831 at skriva eitt uppskot til eina grindareglugerð, sum flutti allar tær gomlu siðvenjureglurnar, sum vóru um grindarakstur og grindabýti, yvir í positiva lóg, og samstundis lagaði hann hesar reglur til samtíðina. Hetta var ein uppgáva, sum Løbner hevði fingið álagt tíðliga í øldini, men hansara uppskot varð ikki góðtikið av myndugleikunum í Keypmannahavn, m.a. tí at revsingarnar fyri brot á reglurnar vóru nógv harðari, enn rímiligt var. Tað er eitt gott dømi um munin á gomlu tíðini og nýggju tíðina við modernaðum amtmonnum.

Tá ið Frederik Ferdinand Tillisch í 1832 fekk klagur frá føroyskum útróðrarmonnum um fremmand fiskiskip, kom fiskivinnan á borðið hjá hesum nýggju amtmonnunum, og tað gjørdist byrjanin til eina nýggja tíð, sum greitt verður frá í komandi kapitlum.

## *3.12 Ummæli av embætisverkinum frá 1836*

J.H. Schrøter, sum var pensjoneraður prestur, skrivaði í 1836 eina merkisverda bók við heitinum *Samling af kongl. Anordninger og andre Documenter, Færøerne vedkommende, tilligemed en Afhandling*. Í innganginum í bókini tók Schrøter líkasum samanum, hvat embætismenninir fyrr høvdu gjørt, og hvat teir áttu at gjørt. Schrøter helt ikki, at tað vóru kongarnir ella stjórnir teirra, sum høvdu skylduna av, at „disse Øer ikke have kunnet holde Skridt med andre af den danske Krones Lande i Henseende til Fremgang i Cultur og oeconomisk Vindskibelighed." Orsøkin var „de paa Færøerne befalende og virkende Embedsmænds Ukyndighed og forskjellige Anskuelser af det for Landets Opkomst Tjenlige. Deres indbyrdes afvigende Beretninger om Landets Tilstand og Fornødenheder, samt umodne Forslag, satte Kongerne og Regjeringen i Uvished om, hvad der kunde være gavnligst." (Schrøter 1836: 2)

Føroyingar ørkymlaðust eisini av hesum skiftandi hugsanunum og ætlanunum, og tað hevði havt við sær, at tað gamla varð hildið at vera tað besta, og tí varð sum longst roynt at skúgva nýggj boð til viks, tí tey fóru helst ikki at verða varandi. Tí gjørdist málið at liva á júst sama hátt sum forfedrarnir, og allar broytingar gjørdust av tí ónda (Schrøter 1836: 3). Veika statsvaldið gjørdi eisini, at meira varð álagt ídna og dugnaliga bóndanum enn dølska og tvøra bóndanum, tí embætismenn høvdu hvørki tíð ella megi til at fáa hesar seinnu til at akta (Schrøter 1836: 4), og tað hjálpti ikki upp á fólksins tiltrúgv upp á myndugleikarnar.

Harumframt gjørdi frástøðan, at undanmaðurin í einum embætisstarvi ikki kundi greiða eftirmanni sínum frá, hví hann hevði gjørt, sum hann hevði gjørt, og hvat endamálið var við ymisku ætlanunum, sum hann var farin undir. Tí var neyðugt hjá einum embætismanni at arbeiða í fleiri ár, bara fyri at skilja, hví skipanirnar vóru, sum tær vóru. Yvirlit yvir landsins lógir og kunngerðir vóru varðveitt í protokollum og embætisbrøvum í stiftsskjalasavninum, og tað var ikki, fyrr enn Føroyar nú høvdu sín egna amtmann, sum eisini búði í Føroyum, at hesi skjøl vóru at finna á amtsskrivstovuni. Sambært Schrøter hevði tað, at skjølini ikki vóru í Føroyum, havt við sær, at ynskiligar ábøtur ikki kundu gjøgnumførast alla staðni, tí embætismenninir vistu ov lítið um, hvørjar ætlanir høvdu verið frammanundan, og tí endaði tað við, at teir komu at velja hvør sína leið (Schrøter 1836: 5).

Tað var fyri at koma hesum trupulleika til lívs, at Schrøter hevði valt at savna saman skjøl, sum vístu, at myndugleikarnir høvdu arbeitt dúgliga og við nærlagni fyri at bøta um búskapin við víðkaðum landbúnaði og tryggari seyðahaldi. Trupulleikin var, at „Menigmand har aldrig været rigtigt underrettet om disse Forslag". Við at lesa skjølini kundu fólk síggja, hvussu nógv var mist sum avleiðing av, at fólk í síni tíð ikki tóku ímóti teimum ætlanum, sum stjórnin royndi at seta í verk. Málið hjá honum við savninum var, at skjølini kundu verða:

talende Beviser paa Regjeringens vise Forsorg, og overlades til Menigmands

*J.H. Schrøter sá longu í 1836, at tað var ein stórur fyrimunur fyri menningina av føroyska samfelagnum, at amtmansembætið og skjalasavnið, sum hoyrdi til tað, nú var í Føroyum. Nú fór at bera til at fáa embætismenn og føroyingar at samstarva til felags frama. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



> Kundskab og Overveielse, i det Haab, at Efterslægten vil have en rigtigere Anskuelse af deres Gavnlighed, og ei lægge Hindringer i Veien for Udførelsen, men med Beredvillighed iværksætte de foreslagne Forbedringer, samt med Taknemmelighed bevidne og paaskjønne Regjeringens Bestræbelser til at fremme deres Velstand (Schrøter 1836: 8).

Sambært Schrøter var tað veika statsvaldið í Føroyum, sum hevði gjørt, at signalini frá myndugleikunum høvdu verið so ógreið og skiftandi. Sjálvt um ætlanirnar um búskaparligar ábøtur høvdu verið góðar á skriviborðinum í Keypmannhavn, so vóru tær á vegnum út til fólk farnar av sporinum so ofta, at lítil tiltrúgv longur var til, at nakað gott kundi koma frá myndugleikunum. Nú Føroyar vóru skipaðar sum sjálvstøðugt amt, var vitanin um undanfarnar ætlanir í Føroyum, og staturin hevði samstundis fingið eina nógv sterkari støðu í landinum. Tí ráddi nú um at fáa embætismenn og føroyingar at taka lógvatak saman til felags frama, og tað mundi vera endamál hansara við bókini.

## *3.13 Samandráttur*

Fríðrikur 3. kongur gav 19. februar 1662 boð um, at lenini og lensmenninir eftir tann dag skuldu nevnast amt og amtmenn. Vanliga hevur verið hildið, at hesi boðini onkursvegna ikki fevndu um Føroyar, tí Gablarnir høvdu Føroyar í len heilt fram til 1708, men alt bendir á, at Føroyar longu frá 1662 vórðu roknaðar sum amt, og at Gabel-feðgarnir eisini roknaðu seg sjálvar sum amtmenn í Føroyum.

At teir varðveittu inntøkurnar av Føroyum og føroyska handlinum, og at lenið ikki endaliga varð uppsagt, fyrr enn Fríðrikur Gabel doyði í 1708, nýtist ikki at tulkast sum, at Føroyar ikki vóru fevndar av amtsskipanini, tí tað tók langa tíð í praksis at fremja ta broytingina, sum varð gjørd á pappírinum í 1662. Tí er tað heldur ikki ósannlíkt, at gjølligari kanningar kunnu koma fram til, at Føroyar vóru eitt amt heilt frá byrjanini av í 1662.

Ivi er, um nakar var stiftamtmaður fyri Føroyar frá 1709 til 1720, tá ið admiralurin Raben varð útnevndur. Raben fekk boð um at fara til Føroya, og ferð hansara og fyrsta tíðin aftaná prógvaðu, hvussu stóran mun tað gjørdi, at stiftamtmaðurin kendi tað landið, sum hann skuldi umsita, og tað er týðiligt tekin um, at ein nærverandi og vitandi stiftamtmaður kundi styrkja um statsins støðu í landinum og harvið loysa eitt sindur upp fyri javnvágsfelluni. Hinvegin gjørdu teir næstu stiftamtmenninar lítlan mun í so máta, tí teir vitjaðu ongantíð landið, og tá ið áhugin fyri at menna búskapin í ríkinum tók seg upp mitt í 18. øld, varð mesti dentur lagdur á Ísland. Tað endaði við, at myndugleikarnir vildu hava stiftamtmannin staðsettan í Íslandi fyri at styrkja statin har, og ein avleiðingin av, at staturin varð styrktur í Íslandi, var, at hann samstundis viknaði í Føroyum.

Sælendsku stiftamtmenninir ásannaðu, at teir vistu lítið og einki um Føroyar, og tí vildu teir helst ikki hava uppgávuna at virka sum stiftamtmenn fyri Føroyar. Hesin hugburðurin styrkti ikki um statsins lut í landinum, men tað hjálpti eitt sindur upp á støðuna, at løgmaður og fúti fingu nakrar av uppgávum stiftamtmansins at røkja. Støðan var kortini framvegis ógreið, tá Danmark endaði í kríggi í 1807 og sum avleiðing av krígnum í 1814 misti Noregi, sum Føroyar løgfrøðiliga á mangan hátt vóru nærri knýttar at enn Danmark. Hesi krígsárini menti amtmansskapurin við kommandantinum og fútanum seg til at virka mestsum púra leyst av stiftamtmanninum og fór at samskifta beinleiðis við hægri myndugleikar uttan um stiftamtmannin. Tí var vegurin ikki so langur at seta ein amtmann, sum bara hevði Føroyar at umsita, og sum búði í Føroyum, tá ið nýggjur stiftamtmaður í 1816 skuldi finnast.

Valdi amtmaðurin, Løbner kommandatur, hevði eina hernaðarliga starvsleið og hoyrdi sum slíkur við til eitt ættarlið av amtmonnum, sum var nærum útdeytt í restini av ríkinum. Nýggja tíðin kravdi eitt nýtt ættarlið av amtmonnum, sum við løgfrøðiligari bakgrund kundu standa fyri at skipa alt ríkið sambært teimum mongu lógunum, sum vóru komnar í kjalarvørrinum á nýskipanunum síðstu áratíggjuni av 18. øld. Nógv bendir á, at Løbner hevði torført við at lyfta hesar partarnar av uppgávu síni sum amtmaður, og tí var tað ikki, fyrr enn ungi løgfrøðingurin C.L. Tillisch í 1825 avloysti Løbner, at tað av álvara fór at merkjast, at ein nýggjur almennur myndugleiki var komin, sum m.a. hevði til endamáls at lyfta føroyska samfelagið inn í ta modernaðu tíðina, sum nýskipanirnar í 18. øld høvdu lagt lunnar undir.

# *4. kapittul*
# *Einahandilin og útflutningur Føroya*

Í øldir var handilin týdningarmiklasta amboðið hjá statinum at útinna vald sítt í Føroyum og øðrum útjaðarum av ríkinum. Gjøgnum handilin bar til at tryggja fólki tær vørur, sum tørvur var á, og á tann hátt gjørdust fólk gjøgnum handilin bundin at statinum. Handilin hevði eisini til uppgávu at útflyta tær vørur, sum vóru framleiddar av teimum, sum brúktu handilin. Á tann hátt hevði handilin stóra ávirkan á, hvør framleiðslan í landinum var, tí Einahandilin forðaði fyri, at íbúgvar vistu nakað um marknaðarprísir úti í heimi. Einahandilin kundi tí fáa stórt yvirskot, tá ið marknaðarprísurin á føroyskt framleiddum vørum vaks, ella prísurin á vørum, sum skuldu seljast í Føroyum, fall, og tí átti tað ikki at verið nakar trupulleiki at rikið ein slíkan handilin við støðugum yvirskoti.

Soleiðis varð støðan kortini ikki, tí handilin var fleiri tíðarskeið rikin við støðugum undirskoti, sum hann kundi verið sloppin undan, um hann bara hevði verið rikin við handilsligum atlitum í huga. Orsøkin var, at handilin umframt handilslig atlit eisini skuldi røkja statsins áhugamál, og tey vóru sambært ástøðinum um javnvágsfelluna at tryggja eitt støðugt samfelag og at forða fyri øllum sambandi millum hetta samfelagið og umheimin, sum ikki gekk ígjøgnum júst Einahandilin. Hetta var leingi ein skipan, sum bæði staturin og føroyingar vóru væl nøgdir við, men stóru broytingarnar síðstu áratíggjuni í 18. øld fingu eisini hesa skipanina at rilla. Skipanin við Einahandli var kortini framvegis galdandi í 1832, tá ið amtmaðurin av álvara fór undir at arbeiða við fiskivinnuni, og tí er bakgrundsvitan um einahandilssøguna av stórum týdningi, tá ið greiðast skal frá strembanini eftir at menna eina fiskivinnu í Føroyum.

Í hesum kapitlinum verður hugt at søguni um Einahandilin og útflutninginum úr Føroyum, og dentur verður lagdur á at greiða frá avgerandi løtum, har broytingar vóru ella kundu verið gjørdar. Á tann hátt ber til at síggja, hvørji atlit vóru ráðandi í rakstrinum av handlinum, og støða kann takast til, um og í hvussu stóran mun javnvágsfellan kann brúkast til at skilja føroysku vinnusøguna fram til umleið 1830.

## *4.1 Føroyahandilin í miðøld og fram til umleið 1600*

Roknað verður við, at føroyingar upprunaliga sjálvir tóku sær av handlinum við útheimin, og ábendingar um slíkan handil eru at finna í Føroyingasøgu, Sverris søgu og søgu Inga Bárðarsonar (Nolsøe og Jespersen 2004a: 225). Við

tíðini bar kortini ikki til at halda hesum handli uppi, og tað er helst orsøkin til, at Magnus Hákunarson Lagabøtari í rættarbótini frá 1271 lovaði at senda tvey skip til Føroya um árið (Mortensen 1955: 7). Í somu rættarbót verður nevnt, at fremmandir handilsmenn útnytta føroyingar, og tað skal revsast harðliga. Henda áseting vísir, at kongsvaldið ikki hevði tamarhald á handlinum upp á Føroyar, og hildið verður, at tað vóru hanseatar, sum vóru farnir undir at keypa stokkfisk og útflyta hann til Evropa (Mortensen 2003: 94).

Næstu øldirnar var Føroyahandilin partur av stríðnum millum hanseatar og kongsvald, sum eyðkendi handilin í Bergen. Kongur royndi síðst í 13. øld og fyrst í 14. øld at halda hanseatarnar burtur frá norska handlinum, men verjupolitikkurin hjá Hákuni 5. varð sleptur, eftir at hann doyði í 1319, og Noregi endaði í kongsfelagsskapi við Svøríki. Frá umleið 1350 fingu hanseatar beinleiðis samband við norskar fiskimenn, og í umleið 1360 varð týska kontórið stovnað í Bergen. Tá høvdu hanseatar av álvara fingið fótin fyri seg í Bergen, og býurin gjørdist ein av høvuðsstøðunum fyri evropeiskan handil (Mortensen 2003: 95). Óstøðuga politiska støðan í Skandinavia gjørdi, at kongsvaldið tykist at hava mist sambandið við skattlondini í 1330- og 1340-árunum, og nøkulunda gott samband kom ikki í aftur, fyrr enn Kalmar-samgongan varð stovnað í 1397 (Mortensen 2003: 95).

Av tí lítla keldutilfarinum, vit hava um føroyska søgu hesa tíðina, sæst, at stór útlendsk kapping var um føroyska bispastólin. Fleiri ferðir útnevndi pávin bispin í Kirkjubø, sjálvt um tað var ein uppgáva hjá erkabispinum í Niðarósa. Enski kongurin royndi at fáa Noregs kong at velja ein av sínum til bisp, men í fleiri umførum endaði tað við, at pávin útnevndi týskar bispar í Føroyum. Ein traktat frá 1415 vísir, at tað var fiskarí, sum var orsøkin til enska áhugan at fáa ein bisp í Føroyum, og tá ið hanseatiska virksemið í Bergen í høvuðsheitum var grundað á handil og útflutning av fiski, er lítið at ivast í, at áhugin fyri føroyska bispasætinum hevði samband við stokkfiskamarknaðin í Miðevropa (Mortensen 2003: 99).

Andras Mortensen hevur róð framundir, at tað vóru týskir handilsmenn, sum fíggjaðu dómkirkjubyggingina í Kirkjubø, meðan Jóhannes týskarin var bispur. Hesir somu týskarar tóku eisini sankta Brendan við sær til Kirkjubøar, tí hann var halgimenni fyri sjófarar. Hetta vísir alt, hvussu stóran týdning handil við føroyskum fiski hevði fyri týskarar. Tað sama sæst møguliga aftur í, at føroyingar tóku rínsku virðiseindina gyllin til sín, og tað, at virðiseindin alin í vaðmali varð skift út við gyllin, gevur ábendingar um, at høvuðsvøra føroyinga hesa tíðini ikki longur kom frá landbúnaðinum, men helst var fiskur. Á tann hátt gav eitt veikt kongsvald fremmandum handilsmonnum góðar møguleikar at virka í, og tí byrjaðu føroyingar í størri mun at fáa sína inntøku frá útflutningi av fiski (Mortensen 2003: 107).

Onglendingar og hollendingar róku eisini handil í Norðurhøvum. Hollendingar fingu handilsrættindi í Noregi í 1443, og í 1490 fingu teir somu rættindi í

*Møguliga er Kirkjubø-múrurin minni um eina tíð, tá ið útlendingar høvdu stóran áhuga í føroyskari fiskivinnu. (Mynd: Danmarks Nationalmuseum)*



Føroyum, sum hansakeypmenn høvdu, og tá høvdu bæði hansar, onglendingar, hollendingar og norðmenn handilsrættindi í Føroyum. Klagur næstu árini vísa, at kappingin var stór, tí norskir keypmenn klagaðu um, at hansakeypmenn troðkaðu norðmenn burtur, og hansakeypmenn klagaðu um, at hollendingar troðkaðu seg burtur (Nolsøe og Jespersen 2004a: 229).

Ein av hamburgarkeypmonnunum, sum virkaði í Føroyum tíðliga í 16. øld, var Joachim Wullenweber. Hann gjørdist kongsins fúti, og tá ið tíð hansara sum fúti var runnin, fekk hann í 1523 loyvi til í eitt ár at fara til Føroya at krevja inn gamla handilsskuld. Tá ið hann kom til Føroya, var Niklas prestur fúti vegna kong, men tí hevði Wullenweber lítla virðing fyri. Hann hótti Niklas til at geva sær peningin, sum hann hevði kravt inn fyri eina bót, sum ein kvinna hevði goldið, tí hon hevði dripið barn sítt. Kvinnan hevði verið frilla hjá Wullenweber, og hann átti helst barnið eisini. Wullenweber hevði eisini brotið eitt bein og ein arm á fútanum og sligið hann fýra ferðir í høvdið, áðrenn hann at enda hevði tvungið hann til at rýma av landinum við kongsins yvirliti yvir, hvør skattur skuldi gjaldast í Føroyum.

Í 1524 var Frideryk de Friese fúti í Føroyum, og tá kom Wullenweber aftur, hesa ferð uttan kongsins loyvi. Henda ferðin var líka harðlig sum tann undanfarna, og hesa ferð tók Wullenweber bókina, har yvirlitið yvir tann skattin, sum føroyingar skuldu gjalda kongi, stóð í. Wullenweber og hansara menn blakaðu fútan í ein bát og róku hann av landinum, og síðani fóru teir kring landið at krevja skattin inn til sín sjálvs. Tí bað kongur myndugleikarnar í hollendska býnum Ter Veere handtaka og rættarsøkja Wullenweber[30].

Hetta stríðið við Wullenweber gevur eina greiða mynd av, hvussu torført tað var hjá kongi at fáa útint vald sítt í einum so fjarskotum landi sum Føroyum. Júst

30 Skriv frá skrivara og undirkanslara Kristians II, Cornelius Duplicius Scepperus síðst í 1524 ella fyrst í 1525. Her úr (Evensen 1908: 16–21).

í august 1524 tók kongur avgerð um at staðfesta forrættindini, sum hollendingar og hansakeypmenn høvdu til handil í Íslandi og í Noregi, men hann staðfesti samstundis, at teir nú skuldu halda seg burtur frá handli við Hetland og Føroyar[31].

Fyrstur at fáa einarætt til handilin upp á Føroyar var Jørgen Hansen, fúti í Bergen. Hann hevði bæði handilin og Føroyar sum len í fimm ár (Mortensen 1955: 9). Í 1529 varð hetta broytt, tí tá fekk Thomas Koppen keypmaður í Hamburg bæði handil og len. Koppen fór til kong við Joachim Wullenweber, borgara í Hamburg, og boðaði kongi frá, at hann av fríum vilja hevði latið Wullenweber fáa helvtina av teimum rættindunum, sum hann hevði fingið (Heiberg m.fl. 1861: 31).

Hesi somu árini fór Fríðrikur 1. kongur at hella til Luther í tí stríðnum, sum herjaði í Týsklandi og øðrum pørtum av Evropa, og tað kom at ávirka viðurskiftini í Føroyum, eins og tað gjørdi aðrastaðni í ríkinum. Beiggi Joakim Wullenweber, Jürgen Wullenweber, var borgmeistari í Lübeck, og hann stóð á odda fyri royndunum hjá lübeckarum at økja um vald sítt í Norðurlondum, eftir at Fríðrikur 1. doyði í 1533 (Olsen og Wittendorff 2003: 178). Tað hevði helst við sær, at Joachim Wullenweber misti síni rættindi í Føroyum, og í hvussu er mistu hansakeypmenn nógv vald av at vera í skeivum parti í borgarakrígnum, sum endaði við siðaskiftinum í Danmark í 1536.

Siðaskiftið merkti, at kongur fekk størri vald. Fyri føroyska handilin merktist tað ikki fyrstu árini, tí Thomas Koppen varðveitti Einahandilin fram til sín deyð í 1553. Tá hevði kongur avgjørt, at allir lensmenn, handverkarar og handilsmenn í ríkinum skuldu vera ríkisborgarar. Tað hevði m.a. við sær, at Kristoffur Valkendorf, lensharri í Bergen, við kanónum noyddi hansakeypmenninar har at gerast ríkisborgarar. (Nolsøe og Jespersen 2004a: 234).

Eftir at Thomas Koppen doyði, var handilin upp á Føroyar fríur í trý ár, so føroyingar fingu loyvi til at handla frítt við danskar og norskar keypmenn. Eftir tað hevði kongur sjálvur Einahandilin á hondum frá 1556 til 1569. Tá fekk Anders Jude, borgari í Keypmannahavn, sum hevði virkað sum keypmaður fyri kong í Føroyum frammanundan, saman við einum av størstu keypmonnunum í Keypmannahavn, Mads Lampe, handilin. Føroyingar klagaðu hesar báðar handilsmenninar, og tí mistu teir handilin eftir hálvttriðja ár, og handilin gjørdist aftur fríur í eini tvey ár, 1571-1573 (Mortensen 1955: 9). Tá fekk hamborgarin Joachim Thim kongligt loyvi at handla í Føroyum, men føroyingar vóru ikki bundnir til at handla við hann (Mortensen 1955: 10).

Hesa tíðina, síðst í 16. øld og fyrst í 17. øld, eftir at hansakeypmenn høvdu mist sína sterku støðu, vaks fram ein borgarastætt í norskum býum, og í keldunum ber til at síggja ein føroyskan borgaraskap í Bergen (Nolsøe og Jespersen 2004a: 238). Kendastur í hesum borgaraskapinum var Magnus Heinason, sum fekk Einahandilin frá kongi í 1579. Magnus hevði handilin í fýra ár, tá ið tað at enda eydnaðist Kristoffur Valkendorf at taka handilin frá honum. Søgan um stríðið millum

31 Uppkast til staðfestingarbræv Fríðriks I, her úr (Evensen 1908: 16)

Valkendorf og Magnus er eitt dømi um stríðið millum aðal og borgarastætt, har tað var eydnast Magnusi sum borgara at fáa ov stóra vælvild frá Fríðriki 2. kongi, og tað skuldi steðgast (Nolsøe 2010: 38). Samgongur millum kong og borgarastætt vóru ein hóttan móti valdinum hjá aðalsstættini, og júst hetta stríðið var eitt av eyðkennunum fyri komandi øldina.

Í 1586 fingu hamborgarin Joachim Weichmand og keypmannahavnarin Oluf Madsen handilin, men fimm ár seinni fór Weichmand burturúr, og tað var endin á týskari ávirkan á handilin. Í 1597 fingu fýra borgarar í Bergen handilin, og ein av teimum helt fram í 1614 saman við fútanum í Føroyum og tollaranum í Bergen. At fúti og tollari komu upp í handilin, komst av, at føroyskar vørur ikki longur kundu útflytast til Bergen tollfrítt (Mortensen 1955: 11). Tollurin var tekin um, at myndugleikarnir fingu størri ávirkan á handilin í ríkinum, og tað kom eisini greitt til sjóndar, tá ið Kristian 4. í 1619 avgjørdi at flyta føroyska handilin úr Bergen til Keypmannahavnar fyri at stuðla undir vinnulívið í ríkishøvuðsstaðnum.

## *4.2 Føroyahandil partur av merkantilismuni hjá Kristiani 4.*

Kristian 4. var bara 11 ára gamal, tá ið pápi hansara, Fríðrikur 2., doyði í 1588, og tí vóru tað fýra limir í Ríkisráðnum, sum stjórnaðu landinum fyri hann fyrstu árini, til hann kundi krýnast 29. august 1596. Tað gjørdi tað m.a. møguligt hjá Valkendorf, sum var ein av teimum fýra, at fáa Magnus Heinason avrættaðan, men so hvørt, sum Kristian 4. vaks og tók á seg meira og meira av sínum valdi sum kongur, minkaði valdið hjá gamla aðalinum. Í handfesti sínum lovaði kongur at stýra ríkinum saman við Ríkisráðnum, men kongur var virkin og framburðssinnaður, meðan aðalsmenninir í Ríkisráðnum ikki vóru serliga framtakshugaðir. Tí kom kongur at stýra gongdini, meðan Ríkisráðið í besta føri kundi steðga onkrum framtøkum eina tíð (Pers 1972: 397).

Kristian 4. sá skjótt, at ríkið var afturúrsiglt í mun til onnur evropeisk lond, og at tørvur tí var á eini modernisering. Búskaparliga skuldi henda moderniseringin fremjast við einum politikki, sum seinni fekk heitið merkantilisma (Gamrath 1980: 28). Ein av mest trúføstu ráðgevarunum hjá kongi var prestasonurin Jonas Charisius, sum var skrivari hjá kongi. Kongur sendi hann í 1607 til Hollands at royna at fáa royndar handverkarar og keypmenn haðani til Danmarkar fyri at menna landsins vinnulív (Olsen og Scocozza 2003: 85).

Holland var, fá ár eftir at hava gjørt uppreistur ímóti sponsku habsburgarunum í 1580-árunum, vorðið eitt av heimsins ríkastu londum, og hollendingar høvdu eitt hægri livistøði, enn nakað fólk nakrantíð hevði havt fyrr. At hollendingar sóu út til at vera so ríkir, vakti áhugan hjá kongum kring Evropa, og onnur lond royndu bæði at læra av hollendingum og at taka kappingina upp við teir. Teir lærdu komu fram til, at tað var yvirskot á handilsjavnanum við onnur lond, sum



*Kristian 4. varð krýndur kongur 29. august 1596, og skjótt sást, at hann sum kongur vildi modernisera kongsríki sítt. Henda stremban fekk við tíðini eisini stóra ávirkan á viðurskiftini í Føroyum. Rasmus Christiansen málaði málningin av krýningarferð Kristians 4. í 1914. (Mynd: wikicommons)*

skapti ríkidømið. Holland innflutti bara rávøru og útflutti bara framleiddar vørur, og tí var útflutningurin størri enn innflutningurin. Niðurstøðan hjá ráðgevum hjá evropeiskum kongum varð, at londini skuldu royna at útflyta so nógv, sum til bar, og innflyta so lítið sum møguligt, og tað vóru serliga framleiddar vørur, sum skuldu útflytast. Hetta var grundarlagið undir tí merkantilistiska politikkinum, sum setti stóran dám at handil og vinnulív í 17. og 18. øld.

Ferðin hjá Charisius í 1607 eydnaðist ikki so væl, men hann kundi sum prestasonur virka fríari enn ráðgevar, sum komu frá aðalstættini. Hann var við ríkisráðharrum, tá ið teir ferðaðust, og á hesum ferðunum fekk hann stóran íblástur av teimum nýggju handils- og vinnupolitisku rákunum, har teir ferðaðust (Olsen og Scocozza 2003: 85), og tí læt hann seg ávirka av gongdini í Hollandi, og hvussu onnur lond svaraðu aftur upp á hollendsku framgongdina. Charisius verður roknaður sum veruligi upphavsmaðurin til donsku merkantilismuna, og hann var so ella so við í øllum stigum tann vegin, til hann doyði í 1619 (Gamrath 1980: 41).

Hesar royndirnar hjá kongi og Charisius at fáa íblástur úr Hollandi var fyrstu ferð, at statsvaldið í størri mun royndi at stýra búskapinum, men tíðarskeiðið, har merkantilistiski politikkurin hjá Kristiani 4. var serliga virkin, var stutt, tí tað fevnir bara um árini 1619-25 (Pers 1972: 391). Endamálið við nýggja handilspolitikkinum var sum í øðrum evropeiskum londum at skapa yvirskot í handilsjavnanum, og tað kundi gerast við at økja um útflutningin og við at fáa sær hjálond, sum kundu lata rávøru og vera marknaður fyri ríkisins framleiðslu (Pers 1972: 393).

Handilskompaní vóru ein týðandi táttur í merkantilistiska politikkinum, og tað fyrsta var Eysturindiska kompaníið, sum varð stovnað í mars 1616 við hollendska eysturindiafelagnum sum fyrimynd (Pers 1972: 399). Í 1619 varð Det petsoriske Kompani stovnað í eini roynd at fáa lut í handlinum við russiskum skinnum,




*Jonas Charisius gav eftir ferðir sínar í Hollandi íblástur til merkantilistiska handilspolitikkin hjá Kristiani 4. (Mynd: wikicommons)*

men russiski zarurin var als ikki áhugaður í kapping í hesum handlinum, so felagið varð avtikið aftur í 1622 (Pers 1972: 400).

Kongur royndi eisini at seta gongd í framleiðslu av ymiskum slag, og málið varð, at staturin skuldi vera sjálvforsýnandi við klæðum. Tí varð eitt betranarhús sett á stovn í Keypmannahavn í 1605, har fangar kundu læra eitt handverk í klædnaídnaðinum (Pers 1972: 401). Í 1620 varð eitt klædnakompaní sett á stovn, og har arbeiddu meir enn 300 sveinar og dreingir, men virksemið vardi ikki so leingi, tí longu í 1628 varð klædnakompaníið niðurlagt aftur (Pers 1972: 401).

Hesa somu tíðina tók kongur eisini stig til at grundleggja fleiri býir. Teirra millum vóru Christianopel, Christiansstad, Christiania, Christianshavn og Glückstadt, sum bæði høvdu til endamáls at virka sum handilsmiðstøðir og sum verjubýir. Størstan týdning fekk nýggi politikkurin hjá Kristani 4. tó á høvuðsstaðin Keypmannahavn, sum vaks og broyttist nógv hesa tíðina, tá ið kongur strembaði eftir at gera býin til ein høvuðsstað, sum kundi samanberast við stórbýir í øðrum londum (Pers 1972: 402).

Sama ár, sum Petsoriska felagið varð stovnað, tók kongur eisini stig til at stovna Det islandske Kompagni, og 16. desember 1619 fekk hetta kompaní einarætt til at reka handil í Íslandi, Føroyum, Vestmannaoyggjunum og Norðurnoreg (Andersen 1964: 28). Limir í felagnum vóru keypmenn í Keypmannahavn, Malmø og Helsingør, og felagið gav teimum góðan vinning, og tað var tað einasta felagið, sum hevði eydnuna við sær (Pers 1972: 400).

Í loyvi sínum fekk felagið álagt, at „al for'ne Compagnies Udredning ske her fra vor Kjøbsted Kjøbenhaffnn og ingen anden Steds. Dog hvad Gods og Vare, som paa for'ne Lande og Steder henskibes, skal enten her i Byen eller og her i Riget indkjøbes det meste mueligt er." (Joensen 1953: 128) Tað er greitt prógv um, at endamálið við felagnum var at styrkja um høvuðsstaðin. Tað sama kann sigast um treytirnar um, at um bryggjarar í Keypmannahavn megnaðu at bryggja líka gott øl, sum tað lybekska, so hevði felagið skyldu til at keypa tað ølið (Andersen 1964: 29–30). Felagið brúkti kortini ikki bara Keypmannahavn, tí ein av orsøkunum til, at tað gekst so væl við felagnum, var helst, at felagið brúkti nýstovnaða býin Glückstadt til inn- og útflutningsmiðstøð (Pers 1972: 400).

Í merkantilistiskum anda royndi felagið at finna nýggjar rávørur. Ein roynd varð gjørd at leita eftir koli í Føroyum, og sjálvt um nakað varð funnið í Suðuroy, so var tað so torført at fáa fatur á, at meira kom ikki burtur úr tí (Andersen 1964: 30). Felagið fekk eisini 18. juni 1634 loyvi til at reka hvalaveiðu undir Íslandi og Føroyum og loyvi til at seta upp lýsiketlar har (Andersen 1964: 29). Fyri hesa verkætlanina er tað mest áhugaverda kortini, at um somu tíð, sum Det islandske Kompagni tók við handlinum, hendi ein stór broyting í útflutninginum úr Føroyum, tí eftir stuttari tíð minkaði útflutningurin av fiski, og samstundis vaks útflutningurin av bundnum hosum. Sjálvt um henda broyting í útflutninginum fall saman við, at nýggj áhugamál tóku við handlinum, hava hesi bæði viðurskiftini ikki verið knýtt saman í føroyskari søguskriving fyrr, men niðanfyri verður ein roynd gjørd at síggja hesa kollveltandi broytingina í útflutninginum sum part av tíðarinnar merkantilistiska ráki.

## *4.3 Hosur avloystu fisk sum høvuðsútflutningsvøra*

Vit mugu ganga út frá, at fiskur var høvuðsútflutningurin hjá hansakeypmonnunum, og hildið hevur verið, at fiskur framvegis var høvuðsútflutningsvøran fram til 1620 (Andersen 1964: 44). Her er kortini vert at viðmerkja, at vit í hvussu er fram til 1709 hava sera fá tøl at halda okkum til, og tí byggir vitan okkara á spjaddar upplýsingar her og har, heldur enn á talrekkjur, sum sjálvandi høvdu verið ynskiligar, tá ið broytingar í útflutninginum skulu viðgerast.

Sambært Lucasi Debes byrjaði um somu tíð „et halff Hundrede Aar", har „Fiskeriet continuerlig er slagen feil", og vóru „Indbyggerne nødde til om de ellers skulde opholde sig at forarbeyde Ulden udi Hoser." Tí vaks útflutningurin av hosum, sum hevði verið eini 200 pør, upp til 60.000 pør í samtíðini hjá Lucasi Debes, sum skrivaði bókina í 1673 (Debes 1963: 279).

Sambært hesari frágreiðingini vóru tað broytingar í náttúruni, sum avgjørdu hesa broyting í føroyska útflutninginum og harvið eisini í vinnusamansetingini. Henda fatanin er síðani endurtikin fleiri ferðir. Millum annað N. Andersen vísti í bók síni frá 1895 til hesa orsøkina, og hann setti árstalið 1620 á sum byrjan til

*Løgmaður skuldi seta innsigli sítt í nøkur hosupør, sum luku lógligu málini. (Mynd: Føroya søga 2)*



svíkjandi fiskarí. Í notu segði hann, at ein orsøk til, at fiskurin hvarv, kundi vera Kyndilsmessan harða, og ein onnur kundi vera teir jarðskjálvtarnir, sum raktu Ísland í 1625 (Andersen 1964: 44).

N. Andersen stuðlar fatan síni um, at tað var miseydnaður fiskiskapur, sum gjørdi, at føroyingar fóru at selja hosur, við einum úttalilsi hjá keypmanninum á Løgtingi 29. juni 1631. Andersen endurgevur keypmannin fyri at siga, at „i det ringeste burde Indbyggerne gjøre gode Hoser, efterdi at Fiskeriet er slaget fejl for de fattige Folk her udi Landet paa nogle Aars Tid.“ (Andersen 1964: 45).[32] Keypmaðurin segði seg hava sent 12.000 hosupør til Hollands við ársins fyrsta skipi, men hann helt ikki, at føroyingar høvdu orsøk til at klaga um vrakingina, tí hann kundi ikki taka ímóti vánaligari vøru, og tí áttu føroyingar at tryggja sær, at hosurnar vóru nóg goðar, serliga tá handilin altíð keypti vørur dýrt at innflyta til Føroya (Joensen 1953: 241).

Annars bendir alt á, at umskiftið til, at hosur gjørdust týdningarmiklasti vinnuvegur í Føroyum, gekk skjótt, tí longu í 1627 klagaði ein partur av almúguni á Løgtingi um, at vetrarkeypmaðurin Christopher Hansen ikki vildi taka ímóti hosum. Vetrarkeypmaðurin vardi seg við at siga, at hann hevði tikið móti meir enn 100 tunnum av hosum frá fátøkum fólki henda veturin, og um tey, sum klagaðu, høvdu bundið sínar hosur eftir forskriftunum, so høvdu tey fingið tað sama fyri tær, sum onnur høvdu fingið (Joensen 1953: 205).

Klagurnar høvdu við sær, at fútin bað løgmann taka 6 hosupør, sum luku lógligu málini, og seta innsigli á tey. Síðani skuldi keypmaðurin hava eitt par, og

32 Sjálvt um Andersen siterar tingbókina, so samsvarar tað ikki heilt við tað, sum stendur í prentaðu útgávuni av tingbókini. Har kundi tað sæð út til, at keypmaðurin, orsakað av miseydnaða fiskarínum, spyr tey, sum klagaðu um vrakaðar hosur, hvat tey so hava gjørt við tær (Joensen 1953: 241).

sýslumenninir hvør sítt, tí so áttu allir føroyingar at vita, hvørji krøvini vóru, um hosurnar skuldu góðtakast sum handilsvøra (Nolsøe og Jespersen 2004a: 255). Fá ár seinni, tá ið klagur aftur komu um hosuvrakingina, fekk løgmaður aftur boð um at koyra innsigli sítt á tvey pør av hosum, sum kostaðu 5 skinn, og tvey pør, sum kostaðu 4 skinn (Andersen 1964: 45).

Kanning av tíggjundaroknskapunum, sum eru til fyri tíðarskeiðið 1584 til 1652, gevur onga ábending um, at fiskurin hvarv í 1620. Tvørtur ímóti var 11 ára skeiðið 1613 til 1624 tey árini, sum góvu størstu inntøkuna av fiskatíggjund í tíðarskeiðinum, og tíggjundin lá árini eftir á sama støði, sum hon hevði ligið á tey fáa árini frammanundan, sum roknskapir eru varðveittir fyri (Guttesen 2004: 15).

Spurningurin er so, um aðrar frágreiðingar kunnu vera til hesa stóru broytingina av føroyska samfelagnum. Tað er í hvussu er torført at góðtaka, at stóra umskiftið í handlinum onga ávirkan skal hava havt á umskiftið í útflutninginum, og tað tykist heldur ikki, sum at frágreiðingin um, at tað bara var náttúran, sum broyttist um júst somu tíð, er haldbar. Hinvegin er keldutilfarið lítið, so torført er at prógva nakað, men aðrar hugsandi frágreiðingar kundu verið t.d. prísur og politikkur.

Ongar broytingar vóru í prísinum, sum Det islandske kompagni gav føroyingum fyri vørurnar, tí í 1630-árunum var hosuprísurin framvegis 5 skinn fyri reyðar hosur og 4 skinn fyri hvítar hosur, og prísurin á fiski var framvegis 1 gyllin ella 20 skinn fyri eina vág, og hesir prísirnir vóru júst teir somu sum í takstinum hjá Niels Skinkel frá 1584 (Andersen 1964: 12).

Sjálvt um prísurin, føroyingar fingu, var tann sami øll hesi árini, so var tann prísurin, sum felagið fekk fyri vørurnar á marknaðinum, meira skiftandi, og stórur munur kundi vera á hesum prísum til tíðir. Tað var hesin prísmunurin í útflutningsvørunum, sum var grundarlagið undir vinninginum hjá handilsfelagnum (Gunnarsson 1983: 33). Gisli Gunnarson hevur í ritgerð síni frá 1983 roknað seg fram til lutfallið á prísinum á fiski og korni, og hesar útrokningar vísa, at fiskaprísurin frá seinni helvt av 15. øld og nakað væl inn í 17. øld var fyri stórum falli (Gunnarsson 1983: 37). Tríggjar orsøkir vóru til hetta prísfallið. Tær vóru, at trúbótin hevði við sær, at færri lond høvdu tørv á fiski í føstu, og at útboðið av fiski øktist nógv, eftir at bankarnir við Ný Fundland og har á leið vóru funnir, og í triðja lagi øktist prísurin á korni, so at fólk ikki longur hevði ráð til at keypa dýrari matvørur, sum fiskur kundi roknast at vera (Gunnarsson 1983: 35). Lægri fiskaprísurin gjørdi tað sjálvandi minni lokkandi hjá felagnum at selja fisk, men ongi prógv eru fyri, at tað hevur verið nýtt sum grundgeving fyri at taka ímóti minni fiski.

Prísurin hevur sjálvsagt stóra ávirkan á politikkin hjá einari handilsfyritøku, men merkantilistisku hugsanirnar við Det islandske kompagni kunnu eisini hava elvt til broytingar. Eitt nú er hugsandi, at felagið fekk nóg mikið av fiskavørum úr Íslandi, har fiskur framhaldandi var høvuðsútflutningsvøran alla 17. øld (Gunnarsson 1983: 34), og tí var ikki brúk fyri somu vøruni úr Føroyum.

Strembanin eftir, at ríkið skuldi gerast sjálvforsýnandi við klædnavørum, kann eisini hava havt týdning fyri at fara frá fiskaframleiðslu til hosuframleiðslu.

Vert er eisini at nevna, at sagnir eru um, at føroyingar fram til umleið 1600 brúktu ein lítlan norskan trist at rógva út við, og at tað ein 25. apríl nær við aldaskiftið hendi ein stór vanlukka, tá ið ein landnyrðingsódn brádliga brast á. 50 bátar gingu burtur hesa ódnina við millum 200 og 300 monnum, og henda vanlukkan var orsøk til, at bann varð sett fyri at brúka hetta bátaslagið, og at føroyski báturin fekk sítt eyðkenda skap (Mentamálaráðið 2012: 6). Nú hava vit sjálvandi ongar haldgóðar keldur til hesa søguna, men óhugsandi er tað ikki, at hendingar av hesum slag hava kravt umskipan av sjóvinnuni, og at tað kann hava sett ein so stóran hvøkk í føroyingar, at hugurin at røkja sjógvin sum vinnuleið fánaði. Óhugsandi er heldur ikki, at ringar tíðir, orsakaðar av stuttu ístíðini, hava gjørt, at tørvur var á øllum mati at halda hungursneyðini burtur, og tí var eingin fiskur eftir til útflutnings. At tíggjundin av fiski sum ávíst omanfyri ikki minkaði hesi árini, tá ið fiskiútflutningurin fall, kundi verið ábending um tað.

At enda er tað ikki minst áhugavert at seta broytingina av føroysku vinnuni tíðliga í 17. øld í samband við danska uttanríkispolitikkin um somu tíð, tí uttanríkispolitikkur var týdningarmikil partur av merkantilistiska politikki Kristians 4., og fleiri avtalur vóru gjørdar við onnur ríki um júst somu tíð, sum Det islandske kompagni yvirtók handilin. Ein týdningarmikil partur av hesum avtalum var, at kongur vildi tryggja sær yvirvaldsrættin í Norðurhøvum. Hetta fall ikki í góða jørð í Onglandi og Hollandi, tí har hildu teir fast uppá, at havið sambært natúrrættinum var frítt at sigla á og fiska í.

Í diplomatisku royndunum at gera eina avtalu við Bretland var Jonas Charisius í Onglandi í februar 1618 við einum skrivi um hvalaveiðuna í Spitsbergen, og hann klagaði eisini um, at skotskir keypmenn framvegis handlaðu í Føroyum, sjálvt um forboð var sett fyri tí. Avleiðingin var, at føroyski handilin hjá kongsins undirsáttum púra oyðilegðist. Jákup 1. kongur lovaði beinanvegin at banna skotum at sigla til Føroya, men torførari var at koma fram til eina semju um hvalaveiðuna (Laursen og Christiansen 1907: 371).

Í apríl 1621 varð ein samstarvs- og handilssáttmáli undirskrivaður millum Ongland og Danmark, og stutt eftir varð eisini ein líknandi sáttmali gjørdur millum Holland og Danmark. Í avtalunum lovaðu londini hvørjum øðrum vinarskap og ikki at stuðla fíggindunum hjá hvørjum øðrum. Í septembermánað varð enn ein avtala skrivað við Holland um, hvussu londini kundu hjálpa hvørjum øðrum, og um hvussu ósemjur í handli skuldu loysast. Ein av trupulleikunum við hesi avtaluni var at finna orðingar, sum loyvdu Danmark at hjálpa Hollandi uttan at skala sambandið við Spania ov nógv (Albrechtsen, Frandsen, og Lind 2001: 403). Avtalurnar við Holland vóru av ymiskum orsøkum ongantíð undirskrivaðar, men helst hava londini hildið seg so nøkulunda til tær kortini.

Hvørja ávirkan hesin uttanríkispolitikkurin hevði á Føroyar, er torført at siga, og tað liggur eisini uttan fyri karmarnar á hesi ritgerðini at kanna henda

spennandi spurningin gjølliga, men tað ber til at staðfesta, at hosurnar sum høvuðsútflutningur Føroya eftir 1620 serliga endaðu á hollendska marknaðinum, og at samband millum Holland og Føroyar sæst aftur í keldunum fleiri staðni. Spurningurin er tí, um hesin útflutningurin ikki hevur verið partur av merkantilistiska handilspolitikkinum hjá Kristiani 4. Um hald er í tí, so kann staðfestast, at búskaparliga framgongdin í Hollandi og tann mátin, sum danski kongurin svaraði hesari framgongd við, eftir stuttari tíð fingu stóra ávirkan á føroyska samfelagið.

Uttan mun til, hvør frágreiðingin so enn var, so var tað ein sannroynd, at í umleið 1620 byrjaði eitt tíðarskeið, har bundnar hosur gjørdust høvuðsframleiðsla og -útflutningur Føroya, og hetta tíðarskeiðið vardi í eini 200 ár. Hetta var búskaparliga grundarlagið undir tí siðbundna statiska bóndasamfelagnum, og tá ið tað var íkomið av, at veiki staturin vildi hava størri ávirkan á gongdina, ber til at siga, at tað er hetta tíðarskeiðið, at javnvágsfellan av álvara byrjar at koma til sjóndar.

Kongur var sera áhugaður í at halda upp á sín yvirvaldsrætt í Norðurhøvum, og áhugin fyri handlinum í Íslandi og Føroyum var liður í hesi stremban. Samstundis var ein týðandi táttur í merkantilismuni at halda øllum fremmandum handilsáhugamálum burtur og tryggja, at íbúgvar ríkisins høvdu allan handil á hondum einsamallir, so at ríkið var so sjálvforsýnandi, sum til bar. Hesi bæði endamálini gjørdu, at stórur dentur varð lagdur á at forða fyri sambandi millum føroyingar og fremmand skip, og tað styrkti um javnvágsfelluna.

Kristian 4. skrivaði longu 8. mars 1616 til føroyingar og boðaði frá, at honum var komið fyri oyra, at onglendingar og aðrir komu til Føroya at handla, sjálvt um tað var ímóti teimum avtalum, sum hann hevði gjørt við einahandilskeypmenn. Hetta var til stóran skaða fyri teir, og tí gav hann strong boð um, at føroyingar eftir henda dag bara handlaðu við teir, sum frá kongi høvdu fingið handilin.[33]

Forboðið móti handli við fremmandar varð endurtikið, tá ið Det islandske Kompagni hevði fingið handilin í 1620. Nýggi fútin, Mads Christiensen, skrivaði 17. august til Løgtingið, at sýslumenninir høvdu boðað frá, at bæði prestar, løgrættumenn og sjálvur løgmaður umframt meginparturin av almúguni hetta summarið hevði handlað við onglendingar. Fútin vísti til kongsins bræv frá 1616 og bað um, at øll brot vóru tikin til viðgerðar á Løgtingi, og dómur feldur. Prestar, løgmaður og løgrættumenn bóðu um at fáa málið útsett til komandi summar, so at teir fingu høvi til at heita á kong um fyri Guds skyld at fyrigeva teimum „deres store Forseelse“ hesa ferð (Joensen 1953: 136).

Ein slík ávaring hevur helst hjálpt upp á at avmarka handilin við fremmandar, men tað steðgaði honum ikki heilt, sum tey nógvu málini um brot á hesar reglur prógva. Føroyingar vardu seg við, at teir bara gjørdu tað av neyð, tá hungurin stóð í durunum, og ein onnur grundgeving var, at tað var so langur vegur at fara til Havnar at keypa, og tí var tað lokkandi at keypa frá skipum, sum komu framvið (Andersen 1964: 54).

---

33 Norske Rigsregistranter IV s. 574.

Í 1652 fekk Det islandske Kompagni sjálvt loyvi til at gera eitt orlogsskip út til at halda vakt í Íslandi og Føroyum. Í brævi dagfest 4. august 1655 sæst, at felagið hevði tikið eitt skip og fekk loyvi til at konfiskera bæði skipið sjálvt og farmin umborð (Andersen 1964: 57). Sjálvt um tað ongantíð eydnaðist heilt at steðga sambandi við fremmandar, so varð stórur dentur lagdur á at steðga loynihandli, heilt fram til Einahandilin varð avtikin, so ongin ivi er í, at hesin tátturin í merkantilistiska politikki Kristians 4. fekk stórar avleiðingar í Føroyum.

## *4.4 Gabel tekur við handlinum í 1662*

Det islandske Kompagni kom í stórar trupulleikar, tá ið kríggj herjaði 1657-60, og endin varð, at tað varð avtikið í mars 1662. Fáar dagar seinni fekk Christoffer Gabel Føroyahandilin við brævi dagfest 3. apríl (Mortensen 1955: 21). Í brævinum fingu Gabel og sonur hansara Frederik Gabel loyvi til „enten alene for sig selv eller og tillige med saadan Interessenter af Indlændiske og Fremmede derom til sig tagendes vorder, fuldkommen at have al Handel paa bemeldte Insuler Færøe og underliggende Øer falde og bruges kan.“ (Mortensen 1955: 23)

Ein avleiðing av, at Gabel fekk handilin, var, at føroyski handilin varð skildur sundur frá tí íslendska. 31. juli 1662 varð eitt nýtt Islandsk kompagni stovnað av fýra av teimum, sum høvdu verið við í eldra felagnum (Thorsteinson 1822: 54). Teirra millum vóru Hans Nansen og Jonas Trellund (Andersen 1964: 66), og Jonas Trellund fekk fyrstu árini eisini til uppgávu at reka handilin fyri Christoffer Gabel, so nakað av sambandi var framvegis millum íslendska og føroyska handilin.

Søgan um, hvussu Jonas Trellund fekk handilin, vísir, at kongur hevði stóra ávirkan á handilin, sjálvt um hann hevði latið Christoffer Gabel hann. Gabel ætlaði, at fúti hansara í Føroyum, Johan Heideman, skuldi hava handilin í hondum, men Jonas Trellund fekk sannført Fríðrik 3. um, at hansara ætlanir við føroyska handlinum fóru at vera til so stóran fyrimun fyri allan handilin í ríkinum, at kongur kravdi av Gabel, at Trellund skuldi hava handilin. Trellund hevði frammanundan verið í handlinum í Amsterdam (Andersen 1964: 70), so hugsandi er, at hesir fyrimunirnir, sum fingu sannført kong, høvdu okkurt við samhandilin við Holland at gera. Í hvussu er vísir hetta, at fyrstu tíðina var merkantilistiski politikkurin hjá kongi týdningarmiklari fyri handilin, enn møguligar ætlanir hjá Gabel.

Nógv er skrivað um sonevndu Gablatíðina frá 1655 til 1709, serliga tí at hon traditionelt hevur verið roknað sum ein tann torførasta tíðin í Føroyum. Í sambandi við alt tað, sum er skrivað um hesa tíðina, er serliga vert at nevna sorinskrivaran N. Andersen, sum í bókini *Færøerne 1600-1709* viðgjørdi handilin, tí tað tykist, sum at tað mesta, sum síðani er skrivað um tíðina, byggir á hansara gransking. Í mun til málið í hesi ritgerðini er ongin orsøk til at gera meira við innflutningspartin av handlinum og allar tær klagurnar, sum komu orsakað

av hesum, tí tað er serliga útflutningurin, og hvussu hann var við til at skapa vinnuliga grundarlagið undir samfelagnum, sum hevur áhuga.

Longu sama ár, sum Gabel tók við handlinum, var prísurin á innfluttum vørum hækkaður (Nolsøe og Jespersen 2004a: 256), men hetta árið var eisini merkt av, at nógvur fiskur var at fáa, og útflutningurin av fiski vaks tí nógv í 1662 og 1663. Tað fekk Gabel til at blanda seg uppí. Hann segði í brævi 16. mai 1664, at føroyski fiskurin var rak, og hann var komin í nógv verri orð, enn hann hevði verið fyrr. Tí fekst eisini minni fyri føroyska fiskin, enn fyri tann íslendska, og tí helt hann ikki, at føroyingar kundi fáa hægri prís fyri fiskin, enn íslendingar fingu (Andersen 1964: 72). Hetta merkti, at prísurin fór úr 20 skinnum niður í 12 skinn fyri eina vág av fiski (Nolsøe og Jespersen 2004a: 256).

Jonas Trellund segði handilin frá sær í 1669, og 10. august sama ár skrivaði Gabel sáttmála við beiggja Jonasar, Eberhard Trellund, um at taka við handlinum. Eberhard helt kortini ikki sínar gjaldsskyldur, og tí legði Gabel í 1670 hald á vørurnar í handlinum. Tá hevði Eberhard Trellund fingið váttan uppá, at fiskaprísurin, sum var ásettur í 1664, framvegis skuldi galda (Andersen 1964: 80).

Christoffer Gabel stóð sjálvur fyri handlinum frá sumri 1670 og fram til 1674. Í Føroyum stóð fútin Søren Pedersen Skougaard fyri handlinum og seinni hálvbeiggi hansara Peder Rasmussen, men tað var óheppið, at tveir so nær knýttir menn komu at sita í ávikavist fúta- og keypmansstarvinum, tí teir nýttu høvið at ríka seg upp, og tað gekk út yvir vanliga føroyingin (Andersen 1964: 82). Henda støðan gjørdi, at føroyingar í fleiri umførum klagaðu um viðurskiftini, og serliga kend er søgan um leiklutin hjá Lucasi Debes í hesum stríðnum.

Løgtingið samtykti á ólavsøku 1672 at senda eina nevnd við trimum monnum til Keypmannahavnar at bera fram klagur fyri kong. Menninir vóru Lucas Debes, prestur í Havn, Hans Hansen, sýslumaður í Norðoyggjum, og Johannes Joensen, sýslumaður í Suðuroy. Í Keypmannahavn varð ein kanningarnevnd sett at viðgera kærurnar, og hon skuldi koma við einum boði uppá, hvussu sleppast kundi undan trupulleikunum í framtíðini. (Mortensen 1955: 28). Føroyingar komu tó ikki bara við klagum, tí teir høvdu eisini ynski um at fáa eitt frítt handilsfelag, sum kundi reka handilin á sama hátt sum undan Gablatíðini, og ein umbøn var eisini um at seta á stovn eitt fiskifelag, sum føroyingar kundu eiga ein fjórðing av. So kundu tey, sum áttu pening, taka lut í felagsrakstrinum, og onnur kundu fara við skipunum ella fáa inntøku av tí arbeiðinum, sum skuldi gerast, meðan skipini lógu í havn (Andersen 1964: 89). Hesi bæði ynskini vórðu ikki gingin á møti.

Úrslitið av arbeiðinum hjá kanningarnevndini var reglugerð frá 16. apríl 1673. Í henni fingu føroyingar viðhald í tí mesta av tí, sum teir høvdu borið fram. Reglugerðin ásetti tó ongar broytingar viðvíkjandi útflutninginum, men ein niðurstøða um loynihandil er kortini áhugaverd. Reglugerðin ásetti, at fremmandur handil var bannaður, so leingi sum handilin gjørdi sína skyldu og hevði nóg nógva vøru. Hinvegin var tað ikki bannað at handla við fremmandar, um tað kundi prógvast, at handlinum vantaði neyðsynjarvøru (Mortensen



*Tað fekk stóra ávirkan á prísirnar á føroysku hosunum, tá ið Frakland í 1672 leyp á Holland. Á málninginum hjá Pieter Wouwerman eru hollendingar 30. desember 1672 farnir undir at taka skansan Coevorden aftur frá fraklendingum. (Mynd: wikicommons)*

1955: 41). Hetta var ein linking av fyriskipanini frá 13. august 1669, sum herdi fyriskipanirnar frá 16. mars 1647 og 2. apríl 1650 og ásetti, at allur handil við fremmandar var bannaður, og at skip, sum høvdu tørv á vatni, skuldu venda sær til fútan í Havn (Andersen 1964: 89).

Fríðrikur Gabel tók við handlinum eftir faðir sín, og hann læt 19. januar 1674 Simon de Petkum og fyrrverandi fútanum Johan Heideman handilin upp í hendi, og Johan Heidemann fór seinni sama ár til Føroya at umsita handilin (Andersen 1964: 107). Sjálvt um Heidemann koyrdi gamla fútan og keypmannin frá, so hildu føroyingar á at klaga. Hinumegin høvdu nýggju keypmenninir stórar trupulleikar av, at prísurin á føroysku vørunum áhaldandi fall í Hollandi, eftir at kríggj var brostið á millum Holland og Frakland í 1672, og Danmark var á hollendskari síðu. Handilin keypti eitt hosupar fyri 1 mark, men hann fekk bara 12 ella 14 skillingar fyri tað, og sama støðan var við fiski, skinnum og fjøður (Andersen 1964: 108).

Gabel royndi at fáa undirtøku í Føroyum fyri, at prísurin varð lækkaður, men føroyingar svaraðu, at tá ið felagið sjálvt fekk vinningin í góðum tíðum, átti tað eisini at taka tapið í ringum tíðum. Í 1676 forðaðu franskir kaparar fyri, at nakað danskt ella hollendskt skip kundi koma til Føroya, og tí fór Christoffur Heidemann, sum var fúti, við einum enskum skipi til London eftir vøru. Har vóru prísirnir hægri, og tí var ein hægri takstur góðtikin tað eina árið. Samstundis hevði kongur góðkent 12. juni 1676, at prísurin á hosum varð settur niður til 12 skillingar, og fiskaprísurin, sum var komin uppaftur á ein gyllin, varð settur niður í 4 markar fyri eina vág (Andersen 1964: 109).

Kríggið fekk ein enda í 1679, og 1. mai 1680 endaði sáttmálin við Petkum og Heideman. Føroyingar nýttu beinanvegin høvi til at klaga um takstin, og

Fríðrikur Gabel svaraði, at hann helt ikki, at høgi taksturin var galdandi longur, nú kríggið var liðugt (Andersen 1964: 110).

Kongur ætlaði at savna íslendska og føroyska handilin aftur og lata eitt kompagní reka hann við hørðum treytum um, at allur handilin í so stóran mun, sum til bar, var innanríkis. Føroyskar vørur kundu seljast á útlendskum marknaðum, men allur fiskur skuldi seljast í Danmark fyri at nøkta ríkisins tørv. Harumframt skuldi tað bannast fremmandum at fiska innan fyri 4 míl fyri at verja handilin. Ætlanin var, at kompaníið skuldu fara at virka við ársbyrjan 1683, men tað gjørdist ongantíð til veruleika (Thorsteinson 1822: 56).

Í staðin helt Fríðrikur Gabel fram saman við Herman Breckling og Søren Laugesen Fohrmann at reka handilin fram til í mai 1683. Tíðirnar vóru sera ringar í Føroyum hesi árini, og føroyingar søgdu, at vantandi vøruflutningur hevði hungursneyð við sær, og føroyingar noyddust í fjøruna at eta fliður og tara og í bøin at eta sýru, sløkju og annað gras. Men hosumarknaðurin í Hollandi var framvegis vánaligur, so handilmenninir søgdu, at annaðhvørt mátti takstirnir setast upp, ella skuldi hosuprísurin lækkast. Í øðrum lagi skutu teir upp, at føroyingar heldur enn at avreiða hosur, fóru yvir til at lata handlinum ull ella spunnið garn (Andersen 1964: 114).

Handilsmenninir vendu sær til kongs fyri at fáa hansara hjálp, og kongur sendi 11. juli 1682 boð til Gabel um at fáa fýra kunnugar menn sendar til Keypmannahavnar at samráðast við keypmenninar um prísirnar. Føroyingar hildu ikki, at handilsmenninir kundu klaga um føroysku vørurnar, tí hvørt ár royndu fólk at gera hosurnar betri. Tí var trupulleikin heldur at finna í, hvussu handilin varð rikin (Andersen 1964: 115).

Teir fýra, sum í 1683 fóru niður til kong, vóru Jóhan Hendrik Weyhe, løgmaður, Pætur Sørinarson, sorinskrivari, Jóhannes Berintsson, úr Kollafirði, og Hanus Hanusarson, sýslumaður í Norðoyggjum. Sendinevndin hevði 23 kærur við sær, og harumframt skuldi nevndin samráðast um prísin á hosum. Í handlinum fingust bara 3 skinn fyri hosuparið, men føroyingar vildu hava prísin settan upp á 4 skinn. Sendinevndin fór heim, áðrenn samráðingarúrslitið varð greitt, men í mai 1685 komu boð um, at prísurin á hosum einans kundi setast upp á 3½ skinn parið. Hetta kom ikki væl við hjá sendinevndini, og serliga Hanus í Gerðum skrivaði seg í søguna við hesum úrslitinum, tí um hann varð yrkt „Hanus við sínum rotna læri, hann fekk skinn av hvørjum pari.“ (Sølvará 2008: 239)

Samstundis sum úrslitið av samráðingunum gjørdist kunnugt, tók Gabel einsamallur við føroyska handlinum. Hann tók misnøgdina til eftirtektar og avgjørdi, at helvtin av hosunum í 1685 skuldi keypast fyri 4 skinn og hin helvtin eftir nýggja takstinum 3½ skinn, men misnøgdin helt fram. Tí gjørdi Gabel 10. oktober 1685 eina avtalu við umboðsmenn fyri føroyingar um, at taksturin upp á hosur skuldi vera 4 skinn, men at prísurin á nøkrum av innfluttu vørunum samstundis kundi hækkast (Andersen 1964: 119).




*Fríðrikur Gabel hevði stórar trupulleikar av, at føroyingar í 17. øld vóru farnir at leggja seg eftir at binda hosur heldur enn at fiska. (Mynd: Tjóðsavnið)*

Henda avtalan steðgaði klagum í eini tvey ár, men hon gav Gabel stórar trupulleikar, tá hann í 1688 sendi herskipið „Justitiu" til Føroya at steðga øllum loynihandli. Loynihandilin man hava verið nógv meira umfatandi, enn hann roknaði við, tí nú fekk handilin 120.000 hosupør heldur enn tey 70.000, sum Gabel hevði roknað við, tá avtalan varð gjørd í 1685 (Nolsøe og Jespersen 2004a: 265). Henda stóra mongdin vísti, at nógv hevði verið selt í loynihandli, og seinni helt Gabel, at hesar hosurnar endaðu í Hollandi, áðrenn hosurnar hjá handlinum komu fram, og at tað oyðiligi marknaðin fyri Gabel (Andersen 1964: 146).

Við so nógv fleiri hosum, enn hann hevði roknað við, fekk Gabel trupulleikar at sleppa av við tær allar. Hann skrivaði til kong um trupulleikan 20. mars 1689 og greiddi frá, at føroyingar framleiddu so nógvar hosur upp á eitt ár, sum tað tók minst trý ár at sleppa av við í Hollandi (Andersen 1964: 120).

## 4.5 Hosuuppreisturin og hundraðárataksturin

Í Hollandi var hosuprísurin farin niður á 1 ríkisdála fyri 10 til 12 pør, og tað var ein prísur, sum fór at forkoma handlinum, um tað ikki eydnaðist at sleppa undan at taka ímóti hosum. Gabel gav í brævi til keypmann sín í Føroyum 19. mai 1690 boð um at siga við føroyingar, at teir skuldu ansa eftir ikki at binda ov nógvar hosur, tí handilin fór bara at taka ímóti 60.000 pørum. Fyri at eggja føroyingum til at lata handlinum ull, skuldi keypmaðurin seta prísin á einari vág av reinari hvítari ull upp á 4 gyllin, sjálvt um taksturin segði 2 gyllin. 4 gyllin svaraði til virðið á 20 hosupørum (Andersen 1964: 122).

11. juni gav keypmaðurin sýslumonnunum boð um at kunngera avgerðina hjá Gabel fyri føroyingum. Hetta setti sinnini í kók, og løgmaður fekk fleiri áheitanir

um at kalla til fundar í Havn at viðgera, hvat gerast skuldi. Umboð fyri allar sýslur uttan Suðuroy savnaðust í Havn 25. juni 1690. Føroyingar vildu halda fast í hosubindingini, og øsingin var so stór, at handilsmaðurin, Niels Rasmussen Hjortshøj, óttaðist fyri lívinum (Andersen 1964: 123). Á fundinum kom fram, at føroyingar hildu, at tá lensharrin bað um at fáa ullina, var tað tað sama sum at biðja um lív føroyinga. Um hann ikki kundi taka ímóti hosum sum gjald fyri innfluttu vørurnar, kundi hann tað sama koyra vørurnar umborð á skipið aftur (Andersen 1964: 124).

27. juni 1690 skrivaði sorinskrivarin kongi bræv, undirskrivað av løgmanni og prósti, við umbøn um, at føroyingar framhaldandi sluppu at lata handilinum hosur, tí „dette fattige Lands Pendinger bestaaer aleneste udi Ulden, forarbejdet til Hoser, og skal vi da nødes til at føre Ulden til Kramboden, saa er baade Liv og Velfærd borte, og al Legems Nødtørft os betagen, saa vi paa den Maade maatte hellere ønske os død end levende.“ (Andersen 1964: 126)

Longu áðrenn fundin í Havn hevði Gabel tikið næsta stigið, tí 21. juni sendi hann keypmanninum bræv, har hann kom við eini nýggjari loysn. Við brævinum vóru 6 ymisk hosusnið, og um føroyingar vildu lata hosur av hesum sløgunum, so kundi handilin taka ímóti øllum tí, sum kundi framleiðast. Á tann hátt vónaði hann, at handilin bara fekk 60.000 pør av tí gamla hosuslagnum. Um føroyingar ikki gingu við til at binda hesar nýggju hosurnar, so setti hann prísin á gomlu hosunum niður aftur á 3½ skinn parið, sjálvt um hann fyrr hevði lovað ein hægri prís (Andersen 1964: 126–127)

Hetta var eitt sindur av einum dupultspæli frá Gabel, tí samstundis sum hann sendi hesa nýggju loysnina til Føroya, skrivaði hann til kong við umbøn um at sleppa at áleggja føroyingum at lata ull til handilin í staðin fyri ein part av hosunum. Henda umsókn hansara varð latin eini nevnd at viðgera. Í nevndini vóru Jens Juel, Mathias Moth, Hans Nansen og Søren Rasmussen Hjortshøj, sum fyrr hevði verið vetrarkeypmaður í Føroyum (Andersen 1964: 127).

Nevndin helt, at Gabel var komin við einum góðum tilboði, tá ið hann hækkaði prísin á einari vág av vaskaðari ull úr 2 upp í 4 gyllin, men nevndin ásannaði, at ein vág ella 36 pund av ull kundu blíva til minst 36 hosupør, so fyri tann fátæka, sum livdi av meirvirðinum í bindingin, var tað stórur missur. Tí mælti nevndin frá at taka av tilboðnum hjá Gabel og heldur senda eina nevnd til Føroya at kanna málið (Andersen 1964: 128).

Kanseliið avgjørdi ikki at senda eina nevnd til Føroya, men gav 15. juli 1690 Gabel boð um at fáa fýra av kunnugastu monnum í landinum til Keypmannahavnar á fund (Andersen 1964: 128). Á heysttingi valdi løgtingið at senda Elias Olufsen í Fuglafirði, Ólav Mikkjalsson í Syðrugøtu, Hans Danielsen í Elduvík og Guttorm í Múla til Keypmannahavnar. Seinni var Kristoffur Hansen í Gerðum valdur at fara við, tá ið tað barst Guttormi frá.

Teir fýra fóru út á heysti til Keypmannahavnar, har ein nevnd varð sett 24. januar 1691 at viðgera málið saman við føroyingunum. Í hesi nevnd vóru somu

*Jens Juel var limur í nevndini, sum skuldi viðgera umsóknina hjá Gabel í 1690. Hann var bróðir kenda admiralin Niels Juel, og hann var javnan sendimaður kongs í millumlanda samráðingum. Harumframt røkti hann gjøgnum árini mong embæti í kongsins fyrisiting. (Mynd: wikipedia)*



menn, sum høvdu viðgjørt umsóknina hjá Gabel um at sleppa at keypa ull heldur enn hosur frá føroyingum. Tó kom hægstarættarhjásitin Ehlers inn í nevndina fyri Søren Rasmussen (Andersen 1964: 136).

Føroysku klagurnar vóru lagdar fram í Ráðstovuni á Keypmannahavnar slotti 16. februar, og 23. mars svaraði Fríðrikur Gabel í longum skrivi. Sama dag legði hann eisini frágreiðingar frá keypmanninum Niels Rasmussen Hjortshøj og fútanum Hans Villumsen fram. Í skrivi sínum, sum mest er at samanbera við eitt verjurit, og tí eisini keldukritiskt skal viðgerast sum eitt slíkt, sigur Gabel nógv áhugavert um søguna um, hvussu føroyingar gjørdust eitt hosuframleiðandi fólk.

Gabel nýtti bókina hjá Lucasi Debes til at vísa á, at frá upphavi høvdu føroyingar ikki bundið hosur til útflutnings, tí Tróndur í Gøtu flutti ull av landinum. Tað var tí ikki, fyrr enn Det islandske kompagni tók stig til hosubinding, at broyting kom í. Tá fingust 20 styver fyri hosuparið í Hollandi, og hosubindingin var tí nakað, sum „Kompagniet selv til sin Nytte og Opkomst har stiftet, og den Nytte, som Bønderne deraf bekommer, er ikkun et Accidens for dem og et *lucrum accessorium* og *extraordinarium*, som med Ret og Billighed den ej længer kan continueres end Kompagniens Nytte derved subsisterer“. (Andersen 1964: 144) Hann helt, at føroyingar vóru sera væl fyri við seyði, kúm, fiski og fugli, áðrenn hosurnar komu upp á tal, og tað áttu teir at kunna blivið aftur, um so øll hosuframleiðslan hvarv.

Tað er týðiligt, at stríðsmálið er um, hvør skal bera tapið av, at hosurnar ikki longur góvu vinning. Var tað bara handilin, ella áttu føroyingar eisini at tikið á seg partar av hesum tapi. Niels Rasmussen Hjortshøj segði, at øll tey meir



*Mathias Moth var ein av fremstu embætismonnum kongs, tá ið hann varð útnevndur til nevndina, sum skuldi viðgera føroyska handilin. (Mynd: wikicommons)*

enn 20 árini, hann hevði virkað við handilin í Føroyum, vóru øll feløgini, sum vóru knýtt at handlinum, farin av knóranum, og tað vóru altíð hosurnar og loynihandilin, sum vóru orsøk til tað (Andersen 1964: 157). Fútin visti eisini at siga, at Gabel nú hevði eitt árligt tap upp á 1250 gyllin av føroyska handlinum (Andersen 1964: 159).

Gabel helt, at ongir bøndur ella undirsáttar í heiminum megnaðu at vinna sær so stóra inntøku innandura, ella meðan tey gingu og váladu, sum føroyingar gjørdu við hosubindingini. Fyri føroyingar var roknistykkið soleiðis, at 1 vág ella 36 pund av ull kundi seljast fyri 1 gyllin í handlinum. Varð ullin heldur nýtt til at binda hosur, fingust 36 pør úr ullini, og tey góvu 7 gyllin og 4 skinn í handlinum. Við øðrum orðum var 620 % vinningur upp á hosuframleiðsluna (Andersen, 1964, p. 145).

Gabel var ikki samdur við Lucasi Debes um, at fólk fóru at binda hosur, tá ið fiskurin hvarv, tí tað var tvørturímóti vinningurin av at binda hosur, sum fekk føroyingar at leggja minni dent á at fiska. Tað var við tíðini so gott sum avlagt, og tað var bara, „naar vor Herre sender saa mangfoldig Fisk, saa at sige ind paa Næsen paa dem, at de mere Lyst end Umage derved kan have, og Profiten af Fiskeriet den Profit af Hoserne kan være nogenledes nær, da lader de Ulden og Hoserne ligge som en Profit, der er dem altid vis nok, og tager imod Fiskeriet som en Profit, dennem ej altid er udi Hænderne.“ (Andersen 1964: 145).

Keypmaðurin var samdur í hesum sjónarmiðinum, og hann legði afturat, at í gomlum døgum, tá føroyingar avreiddu ullina, gjørdu teir meira við fiskarí

og aðrar vinnur. Tað gekk væl hjá bæði landi og handli, „saa længe de lagde sig efter mandelig Arbejde, men nu de har forladt Fiskeriet, slaget sig til kvindagtige Gjerninger og Arbejd og bleven Hosebindere og lært at bruge Kværnen til Bugens Fylde, mener de strax at miste Livet," tá ið ullin skuldi latast til handilin (Andersen 1964: 156–157).

Í nýggjari føroyskari søgugransking hevur verið sagt, at tað var príspolitikkurin hjá Gabel, sum gjørdi, at eingin menning varð í føroyskum útróðri og fiskiskapi (Nolsøe og Jespersen 2009: 316), men tað samsvarar illa við, hvussu harmir bæði Gabel og keypmaður hansara vóru um, at føroyingar ikki fiskaðu meira. Menningin í fiskiskapinum steðgaði longu, tá ið Det islandske kompagni fór at leggja dent á at útflyta hosur, og stóri trupulleikin hjá Gabel og hansara monnum var, at teir ikki megnaðu at fáa føroyingar burtur frá hosubindingini aftur, tá ið marknaðarliga grundarlagið hvarv, og hosurnar bara góvu undirskot.

Gabel endaði skriv sítt við at skjóta upp, at gamli taksturin frá 1684 helt fram, men at prísurin á eini vág av vaskaðari og hvítari ull skuldi vera 3 gyllin og 12 skinn ella 2 skinn fyri pundið. Eitt par av hosum í gomlum sniði skuldi viga eitt pund. Síðani skuldi ein fordeiling gerast, so at handilin kundi taka ímóti 60.000 pundum av gomlum hosum, 30.000 pundum av hosum í nýggja sniðinum, og 30.000 pund skuldu avreiðast av reinari ull. Prísurin á hosunum skuldi hækkast frá 3½ skinni til 4 skinn, og afturfyri fór prísurin á vørum, sum ikki vórðu roknaðar upp í neyðsynjarvørur, so nógv upp, at tað javnvigaði við hækkaða hosuprísin. Ein tunna av byggi skuldi vera 3 skinn bíligari fyri at javnviga tapið, sum íbúgvar fingu av, at ullarprísurin fór úr 4 gyllinum niður í 3 gyllin og 12 skinn (Andersen 1964: 151–152).

Nevndin viðgjørdi nú málið, og hon kom víð sínari niðurstøðu 5. mai 1691. Nevndin helt ikki, at føroyingar høvdu skyldu til at lata handlinum ull, tí so leingi nakar av teimum mintist, hevði handilin tikið ímóti hosum. Nevndin ásannaði eisini, at tað fór at verða ein vanlukka fyri tey fátøku í Føroyum, tí hosubinding var tað einasta arbeiðið, sum kundi geva teimum eitt sindur av vinningi gjøgnum veturin. Taksturin frá 4. desember 1684 skuldi halda fram, og prísurin á hosum skuldi vera 5 skinn fyri eitt hosupar í nýggjum sniði, og minst ein fjórðingur av avreiddu hosunum skuldu vera av hesum slag (Andersen 1964: 161).

30. mai 1691 kom lýsingin av nýggju handilsskipanini í Føroyum. Í henni varð forboðið móti loynihandli styrkt, og reglurnar í fyriskipan frá 13. august 1669 settar í verk aftur. Hinvegin ásetti lógin, at trý skip skuldu sigla til Føroya um árið. Prísurin upp á hosur av gamla sniðinum skuldi verða 3 skinn, og eftir nýggja sniðinum 5 skinn. Harafturat varð prísurin á vaskaðari hvítari ull settur til at vera 6 gyllin fyri eina vág, og ein kvotuskipan varð sett í verk, sum ásetti, at tá ið goldið varð við hosum, skuldi helvtin vera av gomlum sniði, ein fjórðingur av nýggjum sniði, og ein fjórðingur skuldi vera ull (Andersen 1964: 164). Tað merkti, at lutfallið millum hosur og ull varð sett til 3:1, soleiðis, at ein, sum læt

handlinum eina vág av ull fyri 6 gyllin í mesta lagi kundi selja handlinum hosur fyri 18 gyllin (Korsgaard 1979: 114).

N. Andersen helt, at føroyingar við nevndarinnar niðurstøðu høvdu fingið viðhald í øllum avgerandi spurningum, og at nevndin gekk ímóti lens- og handilsmanninum, og hann helt, at tað var nærliggjandi at hugsa, at nevndin hevði hug at fáa handilin yvir til annaðhvørt íslendska handilin ella aðrar keypmannahavnskar borgarar. Tveir av teimum, Hans Nansen og Bartolomæus Jensen, sum báðir kendu handilin út og inn, sótu í nevndini (Andersen 1964: 162). Í fyriskipanini verða Gablarnir ikki nevndir við navni, og tað hevur verið hildið, at tað var tí, at ætlanin var at taka handilin frá teimum (Thorsteinson 1822: 58).

Í *Havnar søgu 1* frá 2004 vísa søgufrøðingarnir Jens Pauli Nolsøe og Kári Jespersen aftur, at fyriskipanin frá 1691 skuldi vera til nakran fyrimun fyri føroyingar. Teir hildu tvørturímóti, at úrslitið var ein vanlukka (Nolsøe og Jespersen 2004a: 343). Grundgevingin fyri hesi niðurstøðuni er, at prísurin á einari tunnu av byggi hækkaði 17 %, og at hosuprísurin fall 40 % ella úr 5 skinnum niður 3 skinn fyri parið (Nolsøe og Jespersen 2004a: 272). Tað er eitt sindur torført at fylgja hesum grundgevingunum, tí trupult er at síggja, hvar prísurin á 5 skinn kemur frá, tí prísurin var frammanundan 3½ skinn, sum vit hava sæð omanfyri. Hinvegin er ongin ivi um, at kvotuskipanin, sum hevði við sær, at nógv ull skuldi seljast óvirkað til handilin, gjørdi umstøðurnar hjá teimum, sum livdu av at virka ullina, vánaligari. Tí ber helst ikki til at siga, at fyriskipanin frá 1691 gjørdi umstøðurnar hjá føroyingum annaðhvørt betri ella verri, tí hon gjørdi helst umstøðurnar betri hjá teimum, sum áttu nógva ull, meðan tey, sum mest livdu av síni arbeiðsmegi, ikki fingu sama ágóða. Hinvegin vísir alt hetta stríðið um hosurnar, at hosubindingin hevði grundleggjandi týdning fyri liviumstøðurnar í Føroyum, og at føroyingar vóru bundnir av at hava góðan og nógvan samhandil við útheimin (Johansen 1997: 68).

Jóan Pauli Joensen hevur ávíst, at prestarnir „udgjorde hele den færøske offentlighed i denne tid.“ Tað vóru teir, sum førdu orðið og skrivaðu, tá ið føroyingar mótmæltu, so tvídrátturin millum føroyingar og handilin var í stóran mun eitt stríð millum keypmenninar og prestarnar. Hørðu mótmælini frá føroyingum ella prestunum komu ikki bara orsakað av hungri, men talan var eisini um ein samanbrest millum tvær grundleggjandi ymiskar búskaparfatanir. Gabel hugsaði marknaðarbúskaparliga, meðan føroyingar og prestarnir høvdu eina meira moralsk búskaparliga hugsan um handilin (Joensen 1991: 78).

Tað kom at seta stóran dám á alla 18. øld, at tað ikki eydnaðist hjá Gabel at steðga hosubindingini. Hosurnar vóru kjarnin í føroyska búskapinum alla øldina, og við føstu prísunum bar til at rokna út, hvussu nógv hosupør kravdust til at gjalda fyri tað, sum tørvur var á í handlinum. Í 1695 tók handilin stig til at innføra hjólrokkin í Føroyum fyri at økja um framleiðsluna. Rokkurin avloysti handsnælduna, og tað var í hesum samanhanginum ein teknologisk kollvelting (Johansen 1997: 68). Hosubindingin gjørdist grundarlagið undir øktari vælferð

í Føroyum, og keypiorkan vaks. Fyri bøndur loysti tað seg at seta húskallar og arbeiðsgentur at framleiða hosur, og samstundis gjørdu hosurnar eisini, at fátøk og ognarleys fingu ein møguleika at liva av meirvirðinum í framleiðsluni. Tí gjørdu hosurnar eisini, at Føroyar í størri mun gjørdist eitt stættasamfelag við stórum muni á ríkum og fátækum. Tá fingu keypmenninir, bøndur og prestar felags áhugamál, tí nú lá vandin í at missa tamarhaldið á lægru klassunum, har fólkatalið øktist (Joensen 1991: 79). Tað stríðið kom rættiliga til sjóndar í sambandi við lógina frá 1777, sum vit venda aftur til seinni.

Hundraðárataksturin var ein vanlukka fyri handilin, tí nú skuldi hann lata betri prís fyri ullina, enn hann megnaði at selja hana aftur fyri, samstundis sum hann áhaldandi skuldi taka ímóti hosum, sum torført var at fáa pening fyri úti í heimi. Hetta ásannaðu myndugleikarnir eisini, tá ið teir tóku við handlinum í 1709, og sjálvt Rentukamarið viðgekk í 1720, at Gabel hevði verið í einari støðu, har handilin bara kundi geva undirskot (Andersen 1964: 162).

Hosurnar vóru dygt materielt grundlag undir javnvágsfelluni. Tað var handilin og merkantilistiski politikkurin hjá kongi, sum settu gongd í hesa framleiðslu, men sum vit hava sæð, gjørdist hon skjótt eitt so týdningarmikið grundarlag undir bóndasamfelagnum, at handilin ikki megnaði at koma burtur frá hesi framleiðslu aftur, tá ið hon fór at geva undirskot. Bøndurnir vildu halda fram við hesi skipanini, og veiki staturin valdi við smærri tillagingum at taka undir við tí, sjálvt um tað merkti, at handilin í fleiri ár gav undirskot. Undirskotið var prísurin fyri tann stabilitetin, sum henda javnvágin gav.

## *4.6 Kongur yvirtekur handilin 1709*

Fríðrikur Gabel skuldi hava Føroyar í len og føroyska handilin, til hann doyði, so ongar stórvegis broytingar hendu í handlinum, fyrr enn hann doyði 21. juni 1708. Í fyrstu syftu varðveittu arvingar hansara handilin í eitt ár, men 18. mai 1709 avgjørdi kongur „for vor egen Regning at lade vort Land Færø for dette indeværende Aar besejle og providere.“ (Mortensen 1955: 43)

Ein nevnd varð sett at gera kongsins ognir í Føroyum upp, og virðismetingin av vørugoymslum, húsum og øðrum ognum hjá handlinum var liðug áðrenn ólavsøku 1709. Tá hevði kongur eisini yvirtikið alt, so at eftir var bara at gjalda eftirkomarum Gabels fyri ognirnar (West 1985: 29).

Tað var helst ikki ætlanin, at kongur skuldi halda fram við at reka handilin í fleiri ár, men meðan nevndin arbeiddi í Føroyum, fór Danmark 28. oktober 1709 upp í Stóra norðurlendska kríggið. Tað fekk stóra ávirkan eisini í Føroyum, og tað gjørdi, at ongar broytingar vóru í væntu, so leingi sum kríggið vardi. Ætlanir høvdu verið um at forpakta handilin burtur, men tær ætlanirnar vóru fyribils sleptar. Eftir kríggið vóru nakrar royndir gjørdar at selja handilin á uppboði, men hesar royndir miseydnaðust allar (Nolsøe og Jespersen 2004a: 275), og tí kom

det Nordenfjeldske renteskriverkontor hjá Rentukamarinum at umsita handilin vegna kong heilt fram til 1771 (Nielsen 1976: 21).

## *4.7 Prísurin á ull settur niður í 1723*

Í bók síni *The History of the Faroe Islands, 1709-1816* hevur John F. West lýst, hvussu Einahandilin virkaði hesi fyrstu árini av 18. øld (West 1985: 48–51), so tað skulu vit ikki gera so nógv meira við her, tí tað er serliga útflutningurin, sum hevur okkara áhuga. Í handlinum var tað taksturin, sum var tann avgerandi, og hann ávirkaði bæði framleiðsluna og nýtsluna í landinum, uttan mun til, um tað var tilætlað ella ikki (Nielsen 1976: 60). Fyri handilin galt um at halda framleiðsluni koyrandi og at tryggja føroyingum mat og aðrar vørur. Á uppsendum vørum var politikkurin týðiligur. Vørur til framleiðsluna vóru sera bíligar, matvørur vóru lutfalsliga bíligar, og luksusvørur vóru dýrar, men handilin gjørdi einki fyri at eggja til nakra nýhugsan (Nielsen 1976: 63).

Kongligu handilsmenninir rendu seg skjótt inn í somu trupulleikar, sum Gabels menn høvdu havt av takstunum áðrenn 1709. Høvuðstrupulleikin var, at handilin skuldi keypa ull fyri 6 gyllin fyri vágina, men hann fekk væl minni fyri hana á marknaðinum í Keypmannahavn. Í 1712 seldi handilin t.d. ull fyri bara 3 gyllin og 12 skinn fyri eina vág, og seinni fall prísurin uppaftur meir. Samstundis var torført at sleppa av við hosur, og í august 1717 var tann trupulleikin so stórur, at hosurnar vóru uppetnar av maðki og møli, so 100.584 pør av hálvfínum og 22.909 pør av grovum hosum vóru søkt í Oyrarsund (Nolsøe og Jespersen 2004a: 274–275).

Roknskapirnir hjá Einahaldinum eru væl varðveittir, frá tí kongur tók við honum, og tí ber betur til at lýsa ymisku tættirnar í handilssøguni við tølum. Á talvu 4.1 eru úrslitini fyri ávikavist innflutningin og útflutningin sett upp, og har sæst týðiliga, at tað serliga var útflutningurin, sum gav stórt undirskot hjá Einahandlinum fyrstu árini.

Fyri at sleppa av við hetta stóra undirskotið gjørdi Rentukamarið í 1714 eitt uppskot um at broyta takstin frá 1691. Stóra broytingin var, at ullarprísurin skuldi lækka úr 6 gyllin niður í 3 gyllin og 12 skinn fyri vágina, og afturfyri skuldi prísurin á feitu vørunum fløt og lýsi hækkast. Einki varð nevnt um, at broytingar skuldu gerast í kvotuskipanini, og tí merkti ein lækking av ullarprísinum, at færri hosur kundu latast inn til handilin. Onki kom burtur úr hesum uppskoti, tí kongur gjørdi av at bíða (Korsgaard 1979: 115).

Aftur í 1718 royndi Rentukamarið at blása lív í takstbroytingina og sendi fútanum málið til viðmerkingar, men einki skjal er til taks, sum vísir nakað svar frá fútanum. Tí varð nýútnevndi stiftamtmaðurin Peter Raben biðin um at taka málið við, tá ið hann fór á Føroyaferð sína í 1720. Í uppskotinum, sum Raben hevði við sær, varð skotið upp at seta prísin á ull til 2 gyllin og 14 skinn, men

Talva 4.1




*Kelda: (Nielsen 1976)*

føroyingar skutu upp, at prísurin skuldi vera 3 gyllin. Tá ið takstirnir vóru til viðgerðar í 1723, greiddi Raben frá, at føroyingar fyrst vóru samdir um 3 gyllin, men seinni høvdu teir kravt 4 gyllin. Spurdur, hví teir høvdu broytt meining, svaraði ein maður, at tað vóru prestarnir, sum høvdu fingið teir til tað (Korsgaard 1979: 116)

Hetta er áhugavert, tí í hesum málinum um takstin á ull sæst, at føroyingar ikki allir høvdu somu áhugamál. Prestar og aðrir stórir bøndur høvdu so nógva ull, at teir megnaðu ikki at virka alla ullina til hosur, og tí vóru teir áhugaðir í at hava ullarprísin so høgan, sum til bar. Smærri bøndur vóru meira heftir at hosuframleiðsluni, og tí vildu teir helst sleppa av við kvotuskipanina, so at teir kundu avreiða alla sína ull í tilvirkaðum hosum. Niðast vóru tey jarðarleysu, sum noyddust at keypa ull og liva av meirvirðinum, sum hosubindingin gav. Tey vóru eisini áhugað í, at ullarprísurin var so lágur, sum til bar (Korsgaard 1979: 114).

3. mai 1723 varð nýggjur takstur og nýggj reglugerð kunngjørd, har ullarprísurin varð settur til 3 gyllin. Hetta varð viðgjørt í sambandi við, at Løgtingið kom saman á ólavsøku sama ár, sjálvt um málið ikki formliga var fyri á sjálvum Løgtinginum. Føroyingar samtyktu at mótmæla og at senda tveir umboðsmenn til Keypmannahavnar at samráðast. Teir báðir, Grækaris Müller, rektari á skúlanum í Havn, og Hanus við Gjógv, bóndi við Øtugjógv, fóru á heysti til Keypmannahavnar við einum bønarbrævi. Í bønarbrævinum varð greitt frá, hvussu vánalig støðan var í Føroyum, og biðið varð um, at kvotuskipanin varð avtikin. Harumframt vóru nógvar klagur um onnur viðurskifti, so helst hevur nýggi taksturin elvt til, at misnøgdin við annað eisini varð tikin fram.

Undir samráðingunum kom til sjóndar, at Hanus við Gjógv sum bóndi á 6 marka garði umboðaði áhugamálini hjá teimum, sum serliga vildu hava kvotuskipanina avtikna, meðan Grækaris var meira áhugaður í at fáa hægri ullarprís (Korsgaard 1979: 120). Smit rentuskrivari, sum stóð fyri nøkrum av samráðingunum, kundi ikki ganga við til at avtaka kvotuskipanina, tí goymslan av hosum var longu alt ov stór. Hann skeyt tí upp at hækka ullarprísin upp á 4 gyllin, sum Grækaris hevði ynskt. Samráðingarnar vóru drúgvar, men at enda fór Hanus við Gjógv til Raben stiftamtmann og boðaði frá, at hann kundi ganga við til, at kvotuskipanin ikki varð broytt, og at ullarprísurin fór upp á 4 gyllin (Korsgaard 1979: 123).

Tað løgna er, at sjálvt um so nógv stríð var av at fáa hækkað ullarprísin aftur, so varð nýggi ullarprísurin á 4 gyllin ongantíð kunngjørdur, og Peter Korsgaard heldur, at orsøkin til tað var, at høvuðsáhugamálið hjá Rentukamarinum var at sleppa av við føroyska handilin, men sjálvt um trý uppboð vóru í 1724, eydnaðist ikki at finna nakran, sum var áhugaður í handlinum (Korsgaard 1979: 124). Eingin vildi ganga við til tær treytirnar, sum ríkið ásetti fyri eina forpaktning, og tað vísir týðiliga, at tað var lítil trúgv uppá, at føroyski handilin fór at geva yvirskot (Nielsen 1976: 58). Royndirnar vóru sleptar, men formliga helst ikki fyrr enn í 1730-árunum, tá ið tølini fyri handilin gjørdust nøkur heilt onnur, enn tey høvdu verið fram til 1723 (Nielsen 1976: 60). Tí var greitt, at Rentukamarið sjálvt framhaldandi kom at sita við handlinum, og tað skuldi tí sjálvt taka tapið á seg, sum kom av at hækka prísin á ull upp til 4 gyllin.

Fyri hesa ritgerðina er áhugavert at síggja, at undir samráðingunum bendir alt á, at Raben sum stiftamtmaðurin royndi at arbeiða til frama fyri føroyingum, meðan teir flestu av hinum samráðingarmonnunum serliga høvdu avleiðingarnar fyri handilin í huga (Korsgaard 1979: 125). Men hetta málið vísir eisini, at valdið hjá stiftamtmanninum var avmarkað í mun til fútan og keypmannin í Føroyum, og lítið er at ivast í, at tað serliga var orsakað av, at hann ikki búði í landinum, sum hinir báðir gjørdu.

Miseydnaðu uppboðssølurnar gjørdu uttan iva sítt til, at Rentukamarið ongantíð sendi avtalaðu fyriskipanina til Føroya, men tað var sambært samtíðar keldum ikki einasta orsøkin til, at avtalan við teir báðar føroyingarnar ikki varð hildin. Sambært Hanusi við Gjógv, sum skrivaði nøkur brøv til Raben stiftamtmann eftir ferðina í Keypmannahavn, var orsøkin tann, at fútin og keypmaðurin gjørdu, sum teimum lysti. Í brævi 28. mai 1725 heitti Hanus við Gjógv vegna allar íbúgvar á Raben um at seta samtyktu fyriskipanina í verk og senda hana til Føroya við fyrsta skipi[34].

Raben svaraði aftur, at hann 6. juli hevði spurt Rentukamarið, hvussu bleiv við samtyktu fyriskipanini, men inntil hon varð kunngjørd, kundu ongar broytingar gerast, og um føroyingar aftur freistaðust til at handla við grovu hosunum, „maae

34 Bræv frá Hanusi við Gjógv til Raben stiftamtmann dagfest Giow i Sydergøte 28. mai 1725. Í brøv til stiftamtmannin 1722-25.



*8. mai 1725 skrivaði Hanus við Gjógv til stiftamtmannin við umbøn um at fáa fyriskipanina, sum hann hevði verið við til at samráðst um, setta í verk.*

de vendte Exemplænten at vorde straffet, saasom Modelens forarbejdelse paa de grove Strømper siunes at være meere en motvillighed end u-mulighed." Í sama brævi hótti hann ikki minni enn tvær ferðir Hanus við revsing, um hann helt á at føra síni sjónarmið um serliga keypmannin og fútan fram[35].

Sostatt royndu føroyingar at mótmæla, men endin varð, at stiftamtmaðurin, sum upprunaliga hevði roynt at arbeitt til frama fyri føroyingar, fór at verja hinar embætismenninar, og við hóttanini um revsing hangandi yvir sær tagnaðu føroysku røddirnar. Kongliga fyrisitingin hevði fingið nógv betri tamarhald á øllum føroyskum viðurskiftum, og samstundis byrjaði ein tíð, har almenni politikkurin mest av øllum var „to leave well alone", sum enski søgufrøðingurin John F. West hevur nevnt tíðarskeiðið frá 1725 til umleið 1760 (West 1985: 9). Trupulleikarnir við kvotuskipanini hvurvu eisini orsakað av broytingum á sølumarknaðinum, tí tá ið góður prísur aftur fekst fyri hosur, var eingin áhugi í at halda fast í avmarkandi kvotunum, og soleiðis hvarv hesin trupulleikin av sær sjálvum, sjálvt um kvotuskipanin ongantíð formliga varð avtikin (Nielsen 1976: 62). Síðsta ullin varð útflutt í 1753 (Nielsen 1976: 42).

## *4.8 Hosuframleiðslan veksur*

Fyriskipanin frá 3. mai 1723 bøtti beinanvegin væl um úrslitið hjá Einahandlinum, og næstu nógvu árini gav føroyski útflutningurin yvirskot, og samstundis var, sum tað sæst á talvuni niðanfyri, fyri tað mesta eisini yvirskot av teimum vørunum, sum handilin innflutti.

35 Bræv frá Raben stiftamtmanni til Hanus við Gjógv dagfest 27. juli 1725. Í Stiftamtmandsprotokol for Færø nr. 3, 1723-1725. Bræv nr. 119, síða 336-338.

Talva 4.2

**Úrslit av ávikavist inn- og útflutningi Einahandilsins 1723-1760**




*Kelda: (Nielsen 1976)*

Í fyrstu syftu var tað lægri ullarprísurin og betri prísir á sølumarknaðinum, sum var orsøk til, at gongdin vendist, men stóri vøksturin í yvirskotinum frá umleið 1730 og frameftir komst serliga av nógv øktum útflutningi av hosum. Á talvuni niðanfyri sæst árligi hosuútflutningurin frá 1709 til 1776.

Talva 4.3

**Hosuútflutningurin 1709-1776**




*Kelda: (Nielsen 1976)*

Á talvuni sæst týðiliga, at útflutningurin av longum hálvfínum hosum er á umleið 30.000 til 40.000 pørum alt tíðarskeiðið, og at stóra broytingin í nøgdini av útfluttum hosum stavar frá teimum stuttu hálvfínu hosunum, sum komu inn sum ein nýggj vøra um somu tíð, sum takstbroytingin frá 1723 varð sett í verk.

Tað var danski flotin, sum var upprunin til stuttu hálvfínu hosurnar. Flotin hevði fyrr brúkt grovu hosurnar, men matrósarnir klagaðu um tær. Tí varð eitt nýtt snið gjørt av 6 divisionsjefum og sent til Føroya í 1723 við boðum um at fáa 5000 pør send um árið. Ein tíð gekk, áðrenn føroyingar fóru at binda hesar hosurnar, tí teir vildu hava 4 skinn fyri tær, men Rentukamarið vildi bara lata 3. Tí kom gongd ikki í, fyrr enn Rentukamarið gav seg (Nielsen 1976: 40–41).

Stutt eftir vóru føroyingar bidnir um at binda sum mest av hesum hosunum, og tað vísti seg, at eftirspurningurin eftir hesum sniðinum var so stórur, at tað aftur fór at loysa seg at binda hosur, heldur enn at lata handlinum ullina. Eftir 1745 kom at kalla eingin ull í handilin, sjálvt um reglan frá 1691 stóð við, og eftir 1746 kom heldur einki skinn í handilin, tí ullin varð tikin av skinnunum og brúkt til hosur (Nolsøe og Jespersen 2004a: 275). Ein orsøk til økta eftirspurningin var, at danski handils- og hernaðarflotin vaks nógv í 18. øld, men hosur fóru eisini framvegis til Hollands, og nakað varð eisini selt á Børsinum í Keypmannahavn (Nolsøe og Jespersen 2004a: 279).

Til endans gjørdist tað soleiðis, at herurin tók næstan allar tær longu hosurnar, meðan tær umleið 80.000 stuttu hosurnar vórðu seldar á uppboði. Sostatt gjørdist statsins partur av hosukeypinum til endans lítil (Nielsen 1976: 46). Á uppboðssøluni í Keypmannahavn vóru umleið 20 størri og smærri keyparar. Teirra millum var tann størsti helst fyritøkan Fabritius & Wever, sum onkur ár keypti meir enn 10.000 hosupør. Keypararnir seldu meginpartin av hosunum aftur í Hollandi, og tí hava teir helst eisini dugað í felag at ansa eftir, at prísurin ikki gjørdist ov høgur (Nielsen 1976: 46).

Staturin keypti altíð til ein prís, sum var hægri enn marknaðarprísurin, og tí hevur Korsgaard staðfest, at alt bendir á, at staturin við sínum innkeypi stuðlaði handlinum og føroyingum rættiliga væl hesa tíðina (Nielsen 1976: 50). Henda hugsan samsvarar væl við ástøði um javnvágsfelluna, og at staturin gjørdi nógv fyri at tryggja støðug samfeløg í útjaðarum ríkisins.

Stóri vøksturin í hosuútflutninginum hevði við sær, at vælferðin øktist í Føroyum, og tað sást millum annað aftur í fólkatalinum, sum vaks frá umleið 4000 í 1720 til 4773 við fólkateljingina í 1769 (Guttesen 2010: 57). Vælferðin gjørdi eisini, at munurin á sosialu bólkunum vaks, tí at hosurnar gjørdu, at teir vælstillaðu bøndurnir gjørdust ríkari, samstundis sum tær góvu ognarleysum møguleika fyri at uppihalda einari familju við hosubinding. Vøksturin av einari sjálvstøðugari ognarleysari stætt varð ein trupulleiki fyri bøndurnar, tí teirra vælferð var í stóran mun treytað av, at teir fingu nóg mikið av bíligari arbeiðsmegi til at virka ullina til hosur fyri seg (Joensen 1991: 79). So leingi, sum til bar at økja um hosuútflutningin, vóru ikki stórvegis tvídráttir at hóma, men tá ið síðsti ullarlagdurin var drigin upp í framleiðsluna, og rávørutilfeingið harvið varð fult

útnyttað, gjørdist støðan ein onnur, tí tá fóru ymisk áhugamál at kappast um tað avmarkaða tilfeingið.

## *4.9 Ullarmangul og fyriskipanin frá 1777*

Handilin var bundin at takstprísunum frá 1691, og heilt fram í 1750-árini vóru søluprísirnir á innfluttum vørum so mikið høgir, at innflutningsparturin hjá handlinum hekk nøkulunda saman. Men mitt í 1750-árunum hækkaði prísurin á korni nógv, og úrslitið var, at handilin fór frá at hava stóran vinning av korninum fyrra partin av áratígginum til at skula keypa tað dýrari, enn hann kundi selja tað fyri, tey síðstu árini av áratígginum (Nielsen 1976: 31). Í 1772 skuldi handilin lata 3 gyllin fyri eina tunnu av byggi, sum føroyingar kundu keypa fyri 2 gyllin og 8 skinn. Samstundis vaks eftirspurningurin eftir korni í Føroyum úr 4.054 tunnum árliga í 1760 til 6.350 tunnur í 1770 (Nolsøe og Jespersen 2004a: 283), og árini 1771-75 innflutti handilin so nógv korn, at tað svaraði til 250 gramm av byggi og 50 gramm av rugi fyri hvønn íbúgva um dagin (Nielsen 1976: 31). Økt nýtsla og hægri prísur fóru at geva handlinum undirskot á innflutningssíðuni, sum tað sæst á talvuni niðanfyri.

Hesi árini hendu nógvar broytingar í ríkisins fyrisiting, og tær ávirkaðu eisini føroyska handilin. Handilin varð 6. juni 1771 lagdur undir Danske Cammer í sambandi við reformarnar hjá Struensee, men eftir at Rentukamarið varð endurreist 14. januar 1773, fór handilin 1. februar sama ár undir Trondhjemske renteskriverkontor, og 6. mai 1773 varð handilin aftur fluttur til Vestindisk-

Talva 4.4




*Kelda: (Nielsen 1976)*

Guineiske Rente- og Generaltoldkammer. Hildið verður, at Generaltollkamarið var virknari og ansaði betur eftir, enn hini kontórini høvdu gjørt (Nielsen 1976: 21), og tað fall tí teimum í lut at gera nakað við undirskotið í handlinum.

At vakstrarmøguleikarnir í hosubindingini hvurvu um somu tíð, sum innflutningurin hjá handlinum fór at geva undirskot, gjørdi, at føroyska samfelagið stóð við eitt vegamót ella eina critical junction, og tær avgerðir, sum fyrisitingin tók, kundu avgera, um samfelagið fór inn í eina góða ringrás, sum gav fólki flest liviumstøður og virkismøguleikar, ella um farið varð inn í eina ónda ringrás, har styrkt var um ekstraktiva bóndasamfelagið.

Høvið at gera nakað við málið um undirskotið av korninnflutninginum fekk Generaltollkamarið, tá Jacob Hveding løgmaður, stutt eftir at hann var útnevndur til Føroya løgmann, skrivaði Generaltollkamarinum bræv 13. september 1773. Í brævi sínum greiddi løgmaður frá, at hann, síðani hann var komin til Føroya, hevði lagt til merkis, at nógv fólk gingu runt og biddaðu ull frá bóndunum, sum vóru bundnir til bæði at geva teimum ull og til at føða tey, meðan tey vóru á garðinum. Hveding segði: „Dette er og bliver da virkelig Grunden til den Mangel, her er paa Tjenestefolk." (*Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission, nedsat i Henhold til Lov af 13/3 1908* 1911: 93).

Generaltollkamarið sendi 8. januar 1774 setta stiftamtmanninum, Andreas Bang, boð um at kanna málið og fáa svar uppá, hví eftirspurningurin eftir korni var øktur, hví so nógv búsettu seg í Havn, um kornveltingin í Føroyum var minkað ella ikki, og hví bóndunum tørvaði arbeiðsfólk. Setti stiftamtmaðurin Bang tók málið upp og sendi spurningarnar víðari til allar embætismenn og prestar í Føroyum. Allir teir spurdu vóru afturhaldssinnaðir og tóku undir við, at trupulleikin var vantandi arbeiðsfólk. Bara Andreas Djurhuus „showed imagination". Hann skeyt upp at deila størstu garðarnar sundur og at menna nýggjan ídnað, til dømis at veva og spinna lín. Hann segði, at hann sjálvur royndi at fáa lín at vaksa í Føroyum (Wylie 1987: 80). Jonathan Wylie tók soleiðis saman um svarini frá embætismonnunum og prestunum í Føroyum:

> A fair reading of all the evidence might have been that agriculture was not seriously in decline; that increased imports of grain were unavoidable and were due to population growth and uncertain weather conditions; and that beggary, while troublesome and perhaps growing, was not out of hand. What the Faroes needed was not more or better agriculture so much as something else to turn to. Unfortunately there was only the sea, which was producing poorly. (Wylie 1987: 80).

Men frágreiðingarnar fingu onga rímiliga móttøku, tí tað fall løgmanni Jacob Hveding í lut at draga samanum, og hann var ikki bara tann, sum visti minst um føroysk viðurskifti, men hann hevði eisini egin áhugamál at røkja. Av øllum var tað serliga Hveding, sum legði dent á, at sonevnda afturgongdin í landbúnaðinum komst av manglandi arbeiðsmegi og ólýdni hjá húskallum og arbeiðsgentum



*Jacob Hveding var løgmaður, tá ið lógin um kornvelting og tænastufólk var til viðgerðar. (Mynd: wikicommons)*

móti sínum arbeiðsgevarum, og tað vóru helst hansara niðurstøður, sum gjørdu, at so stórur dentur varð lagdur á at gera nakað álvarsligt við tey tingini og við biddararnar (Wylie 1987: 81).

Jóan Pauli Joensen hevur eisini víst á, at vælferðin frá hosunum gjørdi, at meira varð velt, men kornnýtslan vaks skjótari, og tí fingu myndugleikarnir í Keypmannahavn eina fatan av, at korninnflutningurin vaks, tí minni varð velt. Hann heldur, at valdsbýtið í samfelagnum gjørdi sítt til, at úrslitið av allari hesari viðgerðini gjørdist ein regressiv lóg, tí fyri bøndur, prestar og embætismenn var fortreytin fyri, at teir fingu sín stóra lut í vælferðini, at teir høvdu nog nógva bíliga arbeiðsmegi, sum kundi binda teimum hosur. Tað var tí eisini ein trupulleiki fyri teir stóru bøndurnar, at hosurnar góvu teimum fátæku møguleika at fáa sær eina familju (Joensen 1991: 79). Við øðrum orðum var kornveltingin bara ein sekunderur trupulleiki, tí stóri spurningurin var, hvør skuldi fáa meirvirðið av hosuframleiðsluni, nú tað ikki longur bar til at økja um hana við at spinna meira ull.

Løgmaður, fúti og sorinskrivari sendu sítt uppskot um, hvussu lógin skuldi síggja út, til setta stiftamtmannin Andreas Bang 8. august 1774. Síðani hendi ikki meir fyrr enn í mars 1776, tá ið stiftamtmaðurin í longum skrivi til generaltollkamarið gjøgnumgekk alt málið. Stiftamtmaðurin tók undir við tí mesta av tí, sum Hveding hevði sagt, og hann tók undir við, at orsøkin til økta eftirspurningin eftir korni var, at veltingin í Føroyum minkaði m.a. orsakað av forsøming, men serliga av vantandi húskallum. Samstundis gingu fólk runt og biddaðu, og tí var tað sjálvsagt at finna onkran veg at fáa hesi at gerast húskallar (Wylie 1987: 83).

Næstan eitt ár gekk, áðrenn Generaltollkamarið sendi málið víðari til Kanselliið 15. februar 1777. Í brævi sínum hevði Bang stiftamtmaður skrivað eitt uppskot

*Lógin frá 21. mai 1777, sum hevur verið nevnd Trælalógin, gjørdi, at bóndasamfelagið gjørdist meira ekstraktivt, enn tað hevði verið. Orsøkin var, at búskaparvøkstur ikki longur kundi byggja á vaksandi nøgd av ull. Rávørutilfeingið var vorðið avmarkað, og spurningurin var, hvør skuldi hava rættin til avmarkaða tilfeingið. (Mynd: history.fo)*


Forordning, angaaende Adskilligt Agerdyrkningen og Tieneste Folk med videre paa Færøe vedkommende.
Fredensborg Slot den 21de Maji 1777.
Kiøbenhavn,
Trykt hos Directeuren over Hans Kongel. Majestæts og Universitæts Bogtrykkerie, Nicolaus Christian Høpffner.

til lóg, og tað var í høvuðsheitum hetta uppskotið, sum Generaltollkamarið sendi víðari til Kanselliið. Í Kansellinum vóru fleiri atfinningarsamar røddir, serliga ímóti giftingarbanninum í § 8, men „siden alle vedkommende ønske det“, sum Luxdorf tók til, gekk tað at enda ígjøgnum (Korsgaard 1982: 63), og kongur kunngjørdi lógina 21. mai 1777. Í innganginum til lógina varð sagt:

> Vi ere komne i Erfaring om adskilligt paa Vort Land Færøe i Svang gaaende Uordener, og især den der nu saa gængse Uldtryglen og Landstripperie, samt deraf flydende Lediggang og Mangel paa TienesteFolk paa Landet, der igien har foraarsaget den i de seenere Tider meget tilvoxne Korn Trang og Agerdyrkningens Aftagelse og Forsømmelse i Landet (*Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission, nedsat i Henhold til Lov af 13/3 1908* 1911: 87).

Sostatt endaði tað við, at føroyska samfelagið fór inn í eina ónda ringrás, og samfelagið gjørdist meira ekstraktivt, tá ið sterkasta stættin tryggjaði sína støðu og inntøku mótvegis lægru stættunum. Niðurstøðan hjá Korsgaard er, at „Fyrsta stigið varð tikið av embætismonnum í Føroyum, men uttan ynski aðaltollkamarsins um at minka um korninnflutningin var fyriskipanin ikki framd í verki.“ (Korsgaard 1982: 64). Tað vóru sostatt samanfallandi áhugamál hjá tveimum ymiskum pørtum, sum gjørdu, at henda regressiva lógin kundi gerast til veruleika.

Sambært ástøðinum hjá Acemoglu et.al. var eingin møguleiki fyri áhaldandi búskaparligum vøkstri í einari slíkari skipan, og tað vísti seg eisini heilt skjótt, at lógin lítla og onga ávirkan hevði á innflutningin av korni. Sama ár, sum lógin

kom í gildi, fekk handilin undirskot, og tað undirskotið stóð við í nógv ár (Wylie 1987: 85). Wylie tók soleiðis saman um tilgongdina til hesa lógina:

> The ordinance of 1777 is a prime example of official good intentions turned upside down by the local Danish officialdom. On the other hand, the few natives who entertained progressive ideas found no hearing in influential circles in Copenhagen and had no popular following at home. (Wylie 1987: 71).

## *4.10 Den Kongelige grønlandske, islandske, finmarkske og færøske Handel*

Meðan embætismenn í Føroyum viðgjørdu, hvat gerast skuldi við økta korneftirspurningin, yvirtók kongur í 1774 íslendska handilin, sum hevði verið rikin av Det almindelige handelskompagni í 10 ár. Henda yvirtøka hevur verið lýst sum eitt gott dømi um kameralismuna í 18. øld, og hesin politikkur samsvaraði væl við almenna politikkin hjá donsku stjórnini í tíðarskeiðinum frá 1772 til 1784 (Gunnarsson 1983: 138).

Búskaparlig menning í norðuratlantiska partinum av ríkinum var hildin at hava avgerandi týdning, og tað var heilt týðiligt, at higartil varð tilfeingi í hesum londum alt ov illa troytt, og orsøkin var, at privatir handilsmenn og handilsfeløg við framíhjárætti ikki høvdu røkt sína skyldu. Fyri kameralistarnar var tað natúrligt, at staturin skuldi taka við handlinum, tá ið avgerð var tikin um, at nakað mátti gerast fyri at lyfta Ísland og Finnmørkina úr teirri búskaparliga tilafturskomnu støðuni, tey vóru í. Harumframt kom, at siglingin upp á hesar partarnar av ríkinum hevði avgerandi týdning fyri danska handilsflotan og fyri danskan sjómansskap, og so vóru londini í norði eisini týdningarmikil hernaðarliga og strategiskt (Gunnarsson 1983: 138).

Endamálið við at yvirtaka handilin var tí ikki, at kongur skuldi hjálpa sínum tegnum í norðurhøvum, men tvørturímóti var tað partur í stórum ætlanum um at menna økið „to the glory of the state“. Hetta er í tráð við rættan kameralistiskan anda, og kameralisman kann lýsast sum teknokratiið hjá tí upplýsta einaveldinum (Gunnarsson 1983: 138).

Avgerandi broytingin í búskaparliga politikkinum í Íslandi var, at kongur fór at gera stórar íløgur í fiskivinnu og handil, og sum ávíst í undanfarna kapitli, komst tað ikki minst av, at stiftamtmaðurin var fluttur til Íslands at búgva og harvið hevði væl størri innlit í viðurskiftini, enn undanmenn hansara høvdu havt. Stjórnin avgjørdi í 1775 at keypa 50 deksfør til at flyta vøru til og úr Íslandi og til at fiska í íslendskum sjógvi, og í 1780 hevði handilin 42 skip á íslendsku grunnunum. Hetta var stór broyting í mun til frammanundan, tí tá høvdu handilsfeløgini bara leigað flutningsskip. Tað merkti, at nú gjørdist handilin ógvuliga kapitalkrevjandi í mun til tíðina frammanundan. Men handilin gav góð yvirskot árini 1774-1782, og orsøkin var uttan iva góðu marknaðirnir í Miðjarðarhavinum, og so at

*Ove Høegh-Guldberg var við til fella Struensee í 1772. Hann hevði so stórt vald í stjórnini, sum kom eftir Struensee, at tíðarskeiðið frá 1772 til 1784, tá ið krúnprinsurin framdi statskvett sítt, verður nevnt Guldbergska tíðin. Guldberg sat sjálvur í nevndini fyri íslendska, finnmarkska, grønlendska og føroyska handilin. Ein av trúføstu samstarvsfeløgum hansara, Christian Ludvig Stemann, var eisini í stjórnini. Tveir av abbasynum hansara fingu sum amtmenn í Føroyum árini frá 1825 til 1837 stóran týdning fyri menningina av føroyska samfelagnum. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



fiskaprísurin øktist sera nógv eftir 1776, tá amerikanska frælsiskríggið gjørdi, at væl minni fiskur varð útfluttur úr Amerika til Evropa (Gunnarsson 1983: 139).

Tað var hesum íslendska og finmarkska handlinum, føroyski handilin gjørdist partur av 1. januar 1777. Grønlendski handilin kom eisini uppí 1. mai 1781, og 2. juli sama ár fekk hesin nýggi samanlagdi handilin eina nýggja reglugerð at arbeiða eftir (Mortensen 1955: 44). Tá ið kapitalurin í ymisku feløgunum varð gjørdur upp í sambandi við, at feløgini vórðu løgd saman, vísti úrslitið, at grønlandshandilin stóð fyri 47,6 %, íslendski og finnmarkski handilin stóð fyri 49,6 %, meðan føroyski handilin stóð fyri 2,8 % av samlaða kapitalinum í felagnum (Gunnarsson 1983: 140). Ein partur av frágreiðingini var helst, at føroyski handilin í nøkur ár hevði givið undirskot og tí hevði minkandi kapital, meðan tað gekk beint øvutan veg hjá íslandshandlinum. Hesi tølini geva eina hóming av, hvussu lítil føroyski handilin var í mun til samlaða norðuratlantiska handilin hjá kongi.

Í stjórnini í nýggja handlinum vóru tveir av týdningarmiklastu monnum í danskari fyrisiting hesi árini, Christian Ludvig Stemann og Ove Høegh-Guldberg. Tíðarskeiðið millum fall Struensee í 1772 og statskvettið hjá Fríðriki krúnprinsi í 1784 verður ofta nevnt Guldbergska tíðin, og Stemann var ein av hansara trúføstu samstarvsmonnum. Hinir báðir vóru konfentsráðslimur J. Erichsen og W.A. Hansen, sum hevði stýrt føroyska handlinum í Keypmannahavn frá 22. januar 1770. W.A. Hansen helt eisini fram sum stjóri fyri føroyska partin av handlinum (Mortensen 1955: 45). Henda samanseting vísir, hvussu stóran týdning, danskir stjórnarmenn mettu norðuratlantiska handilin at hava, men samstundis er hugsandi, at tað, at W.A. Hansen helt fram sum stjóri fyri føroyska partin, ber boð um, at tað ikki var í føroyska handilinum, at tær stóru nýskipanirnar skuldu fremjast.



*Íslendingurin Jón Eiriksson var ein av limunum í Handilsstjórnini. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Tí sæst heldur ikki nógv í Føroyum til kongsins hug „at Handelen og Fiskefangsten i forbemeldte Lande, saavidt mueligt er, skal forbedres og udvides" (Mortensen 1955: 47). Orsøkin var helst fyrst og fremst, at føroyski handilin hevði ovmikið at gera við at minka um undirskotið, sum í tíðarskeiðnum 1777-90 var upp á heili 65.617 ríkisdálar (Mortensen 1955: 51).

Samstundis broyttist gongdin í Íslandi grundleggjandi í 1783, tá ið eldgosið Laki 8. juni fór at goysa og oyðilegði mesta partin av gróðurinum. Tað hevði síðani við sær, at helvtin av øllum kúm og 70 % av øllum seyði í Íslandi doyði. Sama ár endaði Frælsiskríggið í USA, og gongd kom á útflutningin av fiski til Evropa aftur. Tað hevði við sær, at prísurin á íslendskum fiski fall við 26 %, samstundis sum prísurin á korni hækkaði í stórum. Í mun til árini 1780-1782 versnaði handilsjavnin árini 1784-1787 við 42 % (Gunnarsson 1983: 144).

Statskvettið á kongsslottinum í Keypmannahavn 14. apríl 1784 merkti, at tíðin hjá Guldberg við valdið var liðug, og hann gjørdist stiftamtmaður í Århus (Olsen og Feldbæk 1990: 237). Ein nýggj tíð við fleiri týdningarmiklum nýskipanum av landbúnaðinum, teirra millum avtøkan av stavnsbandinum í 1788, var komin, og saman við henni fingu liberalar handilshugsanir eisini betri pláss. Handilsliga var hetta ein uppgerð við merkantilismuna og gamla kompaníveldið. Statsliga stýringin av handli og vinnulívi skuldi vera minni og ikki so beinleiðis, sum hon hevði verið (Johansen 1997: 73).

Tað vóru tí nýggir kustar, sum skuldu taka sær av trupulleikanum av, at íslendski handilin var farin at geva undirskot. Støðan var so vánalig, at kongligi handilin í veruleikanum var farin á heysin, og tí var neyðugt at gera okkurt. 18. august 1786 varð avgjørt, at einahandilin í Íslandi skuldi avtakast. Um somu tíð varð avgerð eisini tikin um at avtaka einahandilin í Finnmørkini. Avgerðin at avtaka handilin í Finnmørkin hevði samband við nýskipanirnar av landbúnaðinum, men

avtøkan av íslendska handlinum var fyrst og fremst fyri, at stjórnin kundu spara pening, og í øðrum lagi var hon hugsjónarliga grundað (Gunnarsson 1983: 148).

Í Íslandi var lítil og ongin áhugi í at fáa frían handil, so avgerðin bygdi ikki á ein vilja til at ganga íslendingum á møti. Hinvegin var íslendska bóndasamfelagið so hart rakt av eldgosinum í 1783 og Móðuherðindin, ella Mjørkatíðini, sum kom aftaná, at tað neyvan var ført fyri at halda uppi sínum parti av javnvágsfelluni og mótmæla avgerðini. Her var av sonnum talan um eina critical junction, og tá ið prinsurin og hansara menn tóku valdið um somu tíð, og ein miðfyrisiting við bæði amtmonnum og stiftamtmanni var ment í landinum, lá væl fyri at velja eina leið burtur úr trupulleikunum, sum førdu inn á eina góða rás við einum meira inklusivum búskapi. Í øðrum samanhangi er ávíst, at Eldgosið Laki á henda hátt var avgerandi fortreyt fyri, at menningin í Íslandi á mongum økjum kom at liggja eina hálva øld framman fyri menningina í Føroyum (Isholm 2018).

## *4.11 Búskaparligar hugsanir í Føroyum í 18. øld*

Upplýsingartíðin og tær búskaparligu hugsanirnar, sum komu við henni, komu eisini til Føroya, og nakrir føroyingar høvdu longu áðrenn lógina frá 1777 borið fram progressivar hugsanir um landsins búskap. Hesar hugsanir vunnu kortini ongan frama tá. Lógin frá 1777 hevði tó ikki nóg stóra ávirkan rætta vegin, og tá ið myndugleikarnir aftur fóru at viðgera føroyska handilin uppundir lógina um handilin frá 1790, vóru størri atlit tikin til tær hugsanir, sum upplýstir íbúgvar høvdu borið fram. Í hesum partinum verður hugt at hugsanum hjá Hans Jacobsen Debes, løgmanni, og Jens Christiani Svabo og teirri móttøkuni, hesar hugsanir fingu hjá tveimum donskum embætismonnum, ávikavist handilsforvaltaranum U.A. Lund og Born kommandanti.

### 4.11.1 Fysiokraturin Hans Jacobsen Debes

Hans Jacobsen Debes hevði í sínum ungu árum lisið løgfrøði í Keypmannahavn, og har fekk hann helst íblástur til nýhugsan á fleiri økjum, sum hann so tók við sær, tá ið hann giftist við dóttir løgmannin Sámal Pætursson Lamhauge, sum hann avloysti í 1752.

Hans Jacobsen Debes tók ongantíð prógv í løgfrøði, men í lestrarárum sínum ávirkaðist hann av upplýsingarstevnuni og framburðshuginum, sum ráddi í Keypmannahavn við skaldinum Ludvigi Holberg á odda. Í upplýsingartíðini var áhugin fyri náttúruni stórur, og í 1742 varð Det Kgl. Videnskabernes Selskab sett á stovn. Tað felagið skipaði í 1749 fyri einari kanningarferð til Íslands, og tað fekk tveir ungar íslendskar studentar til árið eftir at fara til Íslands at kanna, hvussu meira kundi fáast burtur úr náttúruríkidøminum, so at korini hjá íslendingum kundu gerast betri (Marnersdóttir og Sigurðardóttir 2011: 138–139).

Hesin áhugin fyri at fáa meira burtur úr náttúrutilfeinginum hóskaði væl til fysiokratiska hugsan, og Fríðrikur 5. kongur ávirkaðist eisini av slíkum rákum. Hann tók við sum kongur í 1746, tá ið pápi hansara, Kristian 6., doyði, og hetta kongsskiftið hendi um somu tíð, sum nýggjur hugburður vann frama nógv skjótari, enn hann nakrantíð hevði gjørt fyrr (Olsen og Feldbæk 1990: 209).

Ein av fremstu ráðgevum Fríðriks 5. var A.G. Moltke, og hann mælti kongi til at arbeiða við at menna landbúnaðin. Tað sást longu aftur, sama ár sum kongur tók við, tí tá fingu allir amtmenn boð um at senda upplýsingar til miðfyrisitingina um trupulleikar í landbúnaðinum, og tað var í hesum sama andanum, at boð í 1755 fóru út til almenningin um at koma við øllum boðum uppá, hvussu landins vælferð kundi haldast viðlíka, hvussu minkast kundi um útreiðslurnar, og økjast kundi um inntøkurnar (Olsen og Feldbæk 1990: 210). Hesi boðini gjørdu, at ein rúgva av uppskotum og ritgerðum komu inn, og fleiri teirra vóru síðani givin út í tíðarritum og bókum (Djupedal 1957: 51).

Hans Jacobsen Debes løgmaður og Hammershaimb fúti sendu um júst hetta mundið eitt uppskot um við lóg at banna kenningahaldi og leggja alt seyðahald í fela. Um hetta lógaruppskot var svar upp á áheitanina frá kongi, er ógreitt, men nýggjar búskaparligar hugsanir líkar teimum hjá miðfyrisitingini hómast aftanfyri lógaruppskotið. Í fyrstu syftu tók kongur ikki undir við uppskotinum, tí hann skuldi fyrst hava eina frágreiðing um, hvat orðini í uppskotinum merktu. Tað hevur hann uttan iva fingið, tí 19. august 1757 undirskrivaði hann lógina um, at nú skuldi allur seyður leggjast saman í fela. Henda áseting var eisini í nýggju útgávuni av Seyðabrævinum frá 2. apríl 1698, men tað hevði ongantíð eydnast at fáa allar bøndur at fylgja hesi lógaráseting.

Í fyrstu syftu vóru grundgevingarnar tær somu sum í 1698, at feli fór at gera tað lættari at krevja inn tíggjund, og at tað fór at minka um tvístøðurnar, sum javnan endaðu á borðinum hjá myndugleikunum, men tað er greitt, at lógin eisini bygdi upp á onnur rationalistisk sjónarmið. Bøndur vildu skjótt hava hetta lógarkravið tikið av aftur, og tí var spurningurin um fela fá ár seinni tikin upp aftur. Tá skrivaðu Hveding, sum var vorðin løgmaður, Hammershaimb fúti og Peder Samuelsen sorinskrivari eitt stutt álit um málið. Teir settu á ógvuliga rationalistiskan hátt upp fyrimunir og vansar við ávikavist felanum og kenningini. Kenningin var sambært teimum eyðkend av, at tann sterkasti kundi gera nógv fyri sín seyð, men tað gekk í stóran mun út yvir teir veikaru brúkararnar av haganum. Við fela bar til hjá einum manni at røkta allan felags seyðin líka væl, sum 10 til 20 lutánarar hvør í sínum lagi gjørdu í kenning. Á henda hátt varð meira arbeiðsmegi tøk til aðrar uppgávur (*Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission, nedsat i Henhold til Lov af 13/3 1908* 1911: 73–77).

Ein annar avgerandi munur var, at kenningin eggjaði øllum til at hava so nógvan seyð í haganum, sum til bar. Tað hevði við sær, at seyðurin livdi á markinum fyri yvirlivilsi, og tá ið ringu árini so komu, doyði stórt tal av seyði, og upp á

longri sikt gjørdist seyðahaldið óstøðugt. Felin var besti mátin at forða fyri tí, tí áttu allir bøndurnir seyðin í einum hagaparti saman, so kundu teir í felag syrgja fyri, at meir ikki varð sett við, enn hagin megnaði at bera (Bjørk 1956: 72). Á tann hátt gjørdist úrtøkan støðugari, og sjálvt um minni kundi koma burturúr í mun til tey bestu seyðaárini við kenning, so kom samanlagt yvir fleiri ár meira burtur úr seyðahaldinum.

Felin kundi við øðrum orðum gera, at jørðin gav meira av sær, samstundis sum væl minni arbeiðsorka kravdist til seyðahaldið. Hetta minnir ógvuliga nógv um fysiokratiska tankagongd, og tí ber møguliga til at siga, at seyðahald í kenning hoyrir merkantilistisku tankagongdini til, har hvør maður stríðist fyri at fáa so nógv í sín part av einari givnari mongd, meðan hugsanin við felanum var at fáa samlaðu úrtøkuna at vaksa við at arbeiða saman. At tað so ongantíð eydnaðist at fáa allar hagapartar at leggja seyðin saman í fela, er ein onnur søga. Hana ber til at síggja sum, at enn var statsvaldið ikki so sterkt, at tað megnaði at gjøgnumføra sínar egnu lógir.

Í 1763 skrivaði Hans Jacobsen Debes eina bók um, hvussu landbúnaðurin í Føroyum kundi betrast, og lítið er at ivast í, at hann í henni var ávirkaður av teimum nógvu hugskotunum um, hvussu ríkisins landbúnaður kundi bøtast. Útgevarin av bókini segði í fororðunum, at ein patriotur hevði sent honum tekstin, so at „Oeconomiens høye Befordere“ kundu læra eitt sindur um føroyska jarðarbrukið, og við orðunum „hvorved det heele Land merkelig vilde forbedres“ (Debes 1763: 9–10) sæst fysiokratiski hugsunarhátturin týðiliga aftur.

Í innganginum í bókini spurdi Debes, um alt var so gott, sum tað nú einaferð kundi blíva, ella um landið stutt og greitt var so lítið fruktabart, at ongar ábøtur kundu gerast, og í triðja lagi, um „der findes ingen i heele Landet, der enten har Hierne eller Hierte at tiene sit Fædrene-Land.“ Hansara vón var, at einki av hesum trimum var rætt (Debes 1763: 2). Hann hevði sjálvur hugsað um ymisk átøk, og áhugavert er at síggja, at tað einasta, sum hevði hildið honum aftur frá at leggja sínar hugsanir fram, var:

> den Paastaaenhed af Forfædrenes Skikke og Indretninger, der uden videre Omdømme af den gemeene Mand holdes for det bædste, og alt nyt skadeligt. Ja end og, naar en længe ønsket Forandring i en eller anden Ting omsider skeer, er det dog ikke til Maade, allene fordi den viger fra den ældgamle Sædvane, uden Eftertanke om Forandringens Nytte.

Hesi orðini hjá Debes løgmanni minna ótrúliga nógv um tað, sum amtmenn í 1830- og 1840-árunum javnan vístu á sum ein stóran trupulleika. Debes hevði landsins búskap í huga, tá ið hann endiliga fór til verka, og hann helt, at „Ager-Dyrkningen er en Stats eller et Lands visseste Rigdomme“, og tí fór hann undir at greiða frá, „hvor langt den er fra sin Fuldkommenhed“ í Føroyum, har veltingin „rettelig endnu kand siges, at ligge i sin Vugge og første Svøb.“ (Debes 1763: 2)


Sandfærdig og tydelig
Beskrivelse
Om
Ager-Dyrkningen
Og
Korn-Avlingen
Paa
Fær-Øerne.
Til
billig Eftertanke fremlagt
Af
En Patriot.
KJØBENHAVN, 1763.
Trykt hos Directeuren over Hans Kongelige
Majestæts og Universitets Bogtrykkerie
Nicolaus Christian Høpffner.

*Hans Jacobsen Debes gav í 1763 út bókina* Sandfærdig og tydelig Beskrivelse om Ager-Dyrkningen og Korn-Avlingen paa Fær-Øerne. *Fá ár seinni skrivaði hann enn eina bók, har hann kom við ymiskum uppskotum um, hvussu bøtast kundi um Einahandilin. (Mynd: Landsbóksavnið)*

Debes helt, at ein trupulleiki var, at alt ov lítil partur av jørðini varð veltur, tí hansara meting var, at bara ein áttahundraðpartur av øllum landinum varð velt. Soleiðis var støðan, sjálvt um tað uttan fyri bøgarðarnar fleiri staðni vóru sløtt og góð pláss, sum skaparin mátti hava ætlað til „Menneskenes bedre Nytte". Á slíkum økjum kundi mangur fátækur arbeitt fyri føðina, sum í dag var noyddur til at ganga runt og bidda (Debes 1763: 4).

Tað var júst hetta, sum bøtt var um við traðunum og niðursetubygdunum í 19. øld, og sum aftur var eitt avgerandi grundarlag fyri tí fólkavøkstri, sum tá kom. Í fyrstu syftu helt Debes kortini ikki, at tað bar til at gera nakað við at økja um veltu jørðina, tí „vores Ager-Dyrknings-Maade er saa slet, at naar alt er indhøstet, er lidet vundet." Veltingin í Føroyum var „den elendigste i noget Land", og tað vóru bara „Elskere af Antiqviteterne", sum fingu nakað burturúr, tí teir kundu við at hyggja at føroyska jarðarbrúkinum síggja, hvussu norðurlendingar upprunaliga veltu jørðina (Debes 1763: 7).

Trý ár seinni skrivaði Hans Jacobsen Debes enn eina bók, sum tó ikki kom út fyrr enn í 1769. Í bókini, sum vendi sær til kong og fulltrúar hansara í „de kongelige Financer" og í „Cammer-Collegio" og til Stiftbefalingsmannin Christian Lebrecht von Prøk, greiddi hann frá søguni um Einahandilin, og hvussu hann varð rikin í dag. At enda kom hann við nøkrum boðum uppá, hvussu hann kundi rekast framyvir.

Debes staðfesti, at føroyingar vildu hava kong at halda fram at reka Einahandilin, tí tey elstu vistu bæði frá sínum egna ungdómi og frá sínum forfedrum, at fyrr kundi vera so torført at fáa vøru senda til Føroya, at hungurin stóð í durunum, og fólk ótu bæði tara, kókað seyðaskinn o.a., og nøkur doyðu í hungri. Síðan kongur yvirtók handilin hevði sjáldan verið nakar trupulleiki við vøruforsýningini (Debes 1769: 22).

Tí var hansara tilmæli heldur ikki, at føroyingar skuldu fáa sítt handilsfrælsi aftur, tí tað fór „kun at give nogle Rige Anledning til, at udsue den fattige Almue." Sum heild helt Debes, at handilin var væl rikin, men ymiskir vansar vóru, m.a. tí at danskarar og aðrir frammandir í landinum høvdu havt so stóra ávirkan á mótar í bæði klæðum, mati og drekka, at „meget, som man aldrig før har drømt om, (er) bleven til lutter Nødvendigheder." (Debes 1769: 33).

Vit skulu ikki fara nærri inn á, hvørjar vørur talan var um, men økta vørunýtslan kravdi, at útflutningurin úr Føroyum eisini vaks, um javnvág skuldi vera í roknistykkinum. Hann helt, at „alt hvad der kunde giøres til Handels-Vahre, (forstaae, som var til Fordeel) burde antages, hvor lidet det end var, det vilde end med Tiden tiltage." (Debes 1769: 39–40) Tí mælti Debes til, at handilin fór at lata reiðan pening fyri fisk og fjøður, tí tað hevði eggjað íbúgvunum til at selja handlinum meira av hesum vørum, og tað hevði bara verið til fyrimuns fyri handilin (Debes 1769: 39). Debes mælti eisini til at spinna ullina til fínari garn, so betri prísur fekst fyri ullvørurnar (Debes 1769: 42).

Áhugavert er at síggja, í hvussu stóran mun Hans Jacobsen Debes hugsar um framburð fyri landið í síni heild. Hann fekk bæði Platon og Cicero at stuðla sær í tí, tí Platon hevði sagt, at tað rætta var at hava umsorgan fyri allari republikkini, og ikki bara fyri einum parti av henni og so forsøma restina. Hann endaði tann partin við at vísa til Cicero, sum segði, at øll, sum bara hugsa um ein part av býnum, meðan restin verður forsømd, bera við sær sundurlyndi og ósemjur, ið eru tann største vandin av teimum øllum (Debes 1769: 41).

Debes hevði mist konu sína, stutt áðrenn bókin fór til prentingar, og aftast í henni stóð tí yrkingin „En Enkemands Natte-Tanker over sin Kones Grav". Møguliga var sorgin yvir deyðu konuna ógjørlig at koma yvir, men í øllum førum doyði Hans Jacobsen Debes sjálvur seinni sama ár bara 46 ára gamal. Hann kom tí ongantíð at síggja svarið uppá hugsanirnar um Einahandilin, sum handilsforvaltarin U.A. Lund sat og skrivaði og gav út árið eftir.

### 4.11.2 Lund handilsforvaltari svarar aftur

Longu meðan Ulrik Adolf Lund forvaltari skrivaði bók sína, var hann farin undir at leita eftir einum manni, sum kundi taka við sum handilsforvaltari eftir seg. Lund var sjálvur komin í handilin 19. juli 1751 sum hjálpari hjá forvaltaranum Claus Poulsen, og Claus gjørdist eisini verpápi hansara. Tá ið Claus Poulsen so doyði í 1756, tók Lund við starvinum sum forvaltari. Í Keypmannahavn æt keypmaðurin hjá føroyska handlinum árini 1737 til 1750 Henrich Lund (Degn


Anmerkninger
over
Hr. Laugmand
Hans Debes
Afhandling
Om den Færøeske Handels
Forbedring.

Kiøbenhavn,
Trykt hos H. J. Graae, boende ved
Gammel Strand, 1770.

*Handilsforvaltarin U.A. Lund gjørdi í bókini* Anmerkninger over hr. Laugmand Hans Debes Afhandling om den Færøeske Handels Forbedring *viðmerkingar til uppskotini hjá Debes løgmanni. (Mynd: Landsbókasavnið)*

1929: 89). Hann kann hava verið pápi Ulrik Adolf, og um so er, so var Lund bæði føddur og giftur inn í handilin.

Maðurin, sum Lund vildi hava til hjálpara við tí fyri eyga, at hann seinni skuldi taka við starvinum sum forvaltari, var Samuel Hammershaimb. Hammershaimb var í 1769 lesandi á akademiinum í Keypmannahavn[36], og seinni giftist hann við Annu Sophiu Lund, sum var bróðurdóttir Ulrik Adolf. Tá ið fyrsti sonur teirra varð doyptur jólaaftan 1777, varð hann uppkallaður eftir gamla handilsforvaltaranum heldur enn eftir abbanum[37]. Soleiðis minna skiftini av forvaltarum í Kongliga einahandlinum í 18. øld nógv um eina kongarekkju, har tú annaðhvørt vart føddur ella giftur til starvið. Tí var tað eisini lítið hugsandi, at tað vóru handilsforvaltararnir, sum skuldu taka stig til broytingar av skipanini.

Bókin hjá U.A. Lund er skrivað sum eitt langt bræv dagfest 30. desember 1769, og Lund vendir sær í byrjanini til „Min Herre!“, sum hevði biðið um at fáa viðmerkingar til sjónarmiðini hjá Debes løgmanni (Lund 1770: 3). Sostatt var áhugi onkustaðni fyri sjónarmiðunum hjá Debes. Í bókini vísti Lund aftur tí mesta av tí, sum Debes hevði lagt fram. Hann var kortini samdur í, at Einahandilin átti at halda áfram, tí at so leingi, sum landinum tørvaði innflutning av kornvørum, tí íbúgvarnir ikki sjálvir megnaðu at velta til egnan tørv, fóru tey fátøku, sum meginparturin av fólkinum var, at líða undir einari avtøku av Einahandlinum. Tað var bara ein „faderlig Naade af Kongen“ og „medlidende Omhue af de høye Herrer“, sum gjørdi, at kornprísurin frá 1691 framvegis var galdandi, sjálvt um hann aðrastaðni var støðugt hækkaður (Lund 1770: 5).

36 SA. Danske Cancelli. „Diverse dokumenter og regnskaber ang. Færøerne, Island og Grønland“. Bræv til kong frá Uldrick Adolph Lund dagfest í Tórshavn 19. oktober 1769.

37 Kirkjubókin fyri Suðurstreymoy 1757-1780 á www.history.fo.

Lund helt ikki, at broytingarnar í klædna- og matmóta vóru so stórar, sum Debes vildi gera tað til, tí tann einasta stóra broytingin í nýtslu, sum hann dugdi at fáa eyga á, var í húsabyggingini, og „Nu er denne Bygge-Syge kommen saa vidt, at der kommer en Ladning aarlig.“ Trupulleikin var fyri so vítt ikki, at tey, sum høvdu ráð, bygdu sær betri hús, men vansin íkom, tá ið „en Fattig vil efterabe den Formuende,“ tí tá øktist skuldin og armóðin.Tá ið Lund byrjaði í starvi sínum, kom ein timburlast annaðhvørt ár úr Noregi, og tað var nóg mikið til bæði almenna og privata nýtslu umframt bátasmíð, og tá kundi framvegis vera tilfar eftir á goymslu, tá ið næsta skipið kom. Fyri handilin merkti henda økta nýtslan stórt tap (Lund, 1770, p. 10).

Økti keypihugurin hevði gjørt, at innflutningurin nú var nógv størri enn útflutningurin. T.d. var í 1768 innflutt fyri 5967 gyllin 2 ¼ skinn meira enn útflutningurin var, og í 1769 var ójavnin 2452 gyllin og 12 skinn (Lund 1770: 16–17). Av tí sama kundi Lund ikki góðtaka atfinningarnar um, at Einahandilin innflutti ov fáar vørur. Hann brúkti nógva orku til at greiða frá søluni av ymiskum klædnavørum, tí hann helt ikki, at tað var rætt av Debes at siga, at handilin ikki nøktaði eftirspurningin, sum kom av skiftandi móta. Hinvegin var tað ein stórur trupulleiki, at handilin hevði tap av ¾ av vørunum, sum hann seldi, og vinning av ¼. Tí helt hann, at handilin var „en Discretions-Handel, som af blot Naade for at hielpe dette trængende Land føres for Kongens Regning.“ (Lund 1770: 32).

Lund helt kortini ikki, at tað var rætt at broyta handilstakstin frá 1691, sjálvt um „meget Vand er løbet til Stranden siden 1691, til dette 1769 Aar.“ Hann helt heldur ikki, at tað at hækka prísin á føroyskum vørum var ein gongd leið, tí tað var tiltikið millum føroyingar, at 18 skinn fyri eina vág av fiski var góður prísur, og prísurin á hosum var so góður, at handilin javnan seldi tær víðari við tapi (Lund 1770: 32). Á hesum økjunum var alt „Gandske godt og disse ere just Handelens Styrke og bekomme Inbygerne saa vel for dennem, som de nogensinde kunde ønske sig.“ (Lund 1770: 32)

Broytingar í verandi handli vóru tí ógjørligar, tí har var alt so gott, sum nakar kundi hugsað sær. Einasti møguleikin var tí at finna nýggjar vørur, sum kundu økja um úrtøkuna í Føroyum. Tað hevði Debes eisini skrivað eitt sindur um, og her svaraði Lund, at tað var „Gandske ret, ingen har noget herimod at sige!“(Lund 1770: 33)

Debes hevði víst á møguleikarnar í saltfiski, saltaðum lambskjøti og í at spinna ull til fínari tógv, og hesar tríggjar møguleikarnar tók Lund eisini upp. Spurningurin um saltfisk verður nærri viðgjørdur í komandi kapitli, men Lund tók heldur ikki undir við hinum báðum uppskotunum hjá Debes, tí at felags fyri bæði útflutning av saltkjøti og fínt spunnum garni var, at tað hevði gagnað løgmanni sjálvum og nøkrum fáum av teimum allarstørstu bóndunum, men afturfyri hevði tað gingið út yvir øll tey mongu, sum høvdu tørv á at keypa kjøt og at liva av at virka ullina til hosur. Hann tók tí aftur í orð Debesar um, at tað rætta var at hyggja at tí, sum gangaði øllum og ikki bara gav nøkrum ein

fyrimun, tí tað var tað seinna, sum var galdandi í sambandi við hesi uppskot (Lund 1770: 42).

Viðvíkjandi møguleikanum at spinna ull til fínt garn hevði Debes víst á, at tað skuldi minni arbeiðsorka til at framleiða ullina til fínt garn enn til at binda hana til hosur. Henda búskaparliga fyrimunin sá Lund als ikki, tí hann spurdi beinanvegin, hvat tann triðingurin av fólkinum, sum livdi av at binda hosur, so skuldi liva av. Orsøkin til henda óttan hjá Lund var, at tað longu nú komu hópin av klagum um, at ov lítið var til av ull. Klagað varð sjálvt tey bestu árini, og sjálvt bøndur á hampiliga góðum gørðum klagaðu um ringu støðuna, teir vóru komnir í út á vári, tá ið ullin var uppi. Um nóg mikið var til av ull, ella „man havde Friehed at sige migrate Coloni", bar til at taka undir við uppskotinum um at spinna ull til tógv, men sum støðan var, var hetta eitt „stort Intet." (Lund 1770: 44–45)

Teir vóru báðir samdir um, at ein stórur trupulleiki var, at øll ullin í landinum varð nýtt til at framleiða hosur, og tí kundi økt vælferð ikki longur byggja á eina økta framleiðslu, tí eingin rávøra var at fáa. Debes løgmaður vísti á, at „Nu omstunder drives denne handtering saa stærk, at al Landets Uld bliver opbrugt, hvorover hans kongl. Majestæt maae overlade Indbyggerne sin Tiende-Uld af Landet." (Debes 1769: 26). Lund mintist, at 30 ár frammanundan vóru 700 vágir av ull seldar av landinum, men hesin handilin var heilt steðgaður síðstu 15 árini, og nú hevði landið tørv á at keypa ull heldur enn at selja hana. Lund helt, at ein orsøk til vøksturin í bindingini var, at grindin hvarv, og ein onnur orsøk var, at føroyingar vóru so royndir í hosuarbeiðinum, at teir nú megnaðu at framleiða tvey pør upp á somu tíð, sum teir fyrr komu við einum (Lund 1770: 45).

Sambært Lund var tað sostatt ein samanseting av neyð og størri effektiviteti, sum fekk fólk at økja um hosubindingina, og so bundnir vóru sjálvt nógvir bøndur av henni, at teir vóru farnir at gjalda við tálg heldur enn við skinnum, sum tær gomlu lógirnar ásettu, fyri at sleppa undan at sita við hondunum í føvninginum ein stóran part av árinum (Lund 1770: 46).

Niðurstøða hansara var, at um spinning varð innførd, fór fremsta avleiðingin at verða, at almúgan misti allar møguleikar sínar at vinna sær til føðina, og samstundis fóru bøndur, ið megnaðu at lata eina hjálpandi hond í dag, at verða so sperdir, at teir ikki megnaðu at hjálpa næsta sínum (Lund 1770: 46). Lund hevði eina søgu um ein hollendskan hosuframleiðara, sum einaferð fekk vitjan av einum „Projectmager". Hann hevði eitt hugskot um, hvussu virkið kundi framleiða líka nógvar hosur upp á ein dag, sum tey 100 fátøku børnini á virkinum kláraðu at framleiða upp á eina viku. Hosuframleiðarin var sjálvandi fegin um hetta hugskotið og fór til myndugleikarnar við tí. Eisini har var stór virðing fyri uppfinnaranum, men tey spurdu, hvussu framleiðarin so ætlaði, at børnini skuldu fáa til lívsins uppihald. Tað dugdi hann ikki at svara uppá, og tí avgjørdi hann at halda fram við virkseminum, sum hann hevði gjørt áður (Lund 1770: 47).

Hetta er eitt frálíkt dømi um, hvør støða skuldi takast, tá ið ídnaðarkollveltingin gjørdi vart við seg. Vinnan var komin til eitt vegamót, og nýggir framleiðsluhættir skuldu avloysa teir gomlu. Talan var tí um eina critical junction, og spurningurin var, hvussu samfelagið kundi koma inn í eina positiva ringrás. Skuldi tað henda, var brúk fyri tí, sum Schumpeter hevur lýst sum „creative destruction“, og henda niðurbrótingin av tí gamla var neyðug, tí uttan hana var ikki pláss fyri nýggjum vinnum og framleiðsluhættum, og tí fór samfelagið at standa í stað, um niðurbrótingin ikki varð framd.

Sum handilsforvaltari í kongliga handlinum kundi Lund bara taka undir við, at tað rætta var at vísa nýhugsanini burtur, tí hansara hugsan var, at tann dagin, almúgufólk í Føroyum ikki longur høvdu møguleikan at vinna pening við at virka ull til hosur, gjørdust tey ein byrða hjá Einahandlinum, tí tá høvdu tey ongan annan møguleika enn at seta seg í skuld í handlinum. At standa í stað gjørdist tí tryggasta valið.

### 4.11.3 Økonomisk selskab

Ulrik Adolf Lund skrivaði eitt uppskot um at stovna eitt Økonomisk selskab í Føroyum[38]. Í uppskotinum til føroyska felagið skrivaði Lund, at 6 ella 7 persónar skuldu løggildast til at virka til frama fyri føroyskum búskapi. Fyri at fremja kornveltingina skuldu teir hava eftirlit við veltingini, og bøndur, sum ikki brúktu sína jørð til fulnar, skuldu minnast á sínar skyldur. Bøndur, sum høvdu hug til at gera meira, enn bøur teirra loyvdi, skuldu hava loyvi til at víðka um bøin, og sýslumenninir skuldu hvørt ár lata inn eitt yvirlit yvir korntíggjundin í síni sýslu, so tað bar til at kanna, hvørja ávirkan mongdin av tara hevði, og um nógvur kavi um várið var orsøk til minni vøkstur, ella afturgongd komst av „Skjødesløshed og Efterladenhed“ (Schrøter 1836: 114–115).

Felagið skuldi eisini virka fyri at rætta upp upp á ringu støðuna tænastufólkum viðvíkjandi, sum landið var komið í. Ein skaðiligur óvani var, at húskallar og arbeiðskonur roknaðu húsbóndan sum sín javnlíka, og tí vórðu tey sjálvráðin og gjørdu ikki altíð eftir bóndans boðum. Orsøkin til hesa støðu var ikki, at fátækir føroyingar vóru ringir og óargaligir, men heldur, at øll vóru í ætt við hvønn annan í einum so lítlum samfelag. Harumframt var lønin lítil, og tað eggjaði til líkasælu. Ein annar skaðiligur óvani var, at nógv, sum ikki tímdu at tæna hjá bóndum, fluttu til Havnar at búgva, og tí vantaði bóndanum fólk. Fekst vend

38 Sambært J.H. Schrøter var uppskotið skrivað longu í 1761 (Schrøter 1836: 118), og tað er sera áhugavert, tí vanlig fatan er, at fyrsta felagið av hesum slagnum í danska heildarstatinum var Det kongelige danske landhusholdningsselskab, sum varð stovnað í 1769 (Engelhardt 2006: 33). Schrøter hevði sjálvur tvey brøv dagfest í 1764, sum vístu, at felagið var virkið, men í uppskotinum, sum hann eisini endurgevur í bók síni, stendur, at felagið árliga skal skriva eina frágreiðing um støðu landsins til „det Høikongelige danske Kammer“. Danske Kammer var partur av fyrisitingini hjá Struensee og var tí bert til árini 1771-72. Tí tori eg heldur ikki at siga, at felagið er eldri enn 1771.

ikki á hesa gongdina, „maa man ansee Færøerne at have et friskt Legeme, men en lam Fod og derfor ei kunne komme afsted.“ (Schrøter 1836: 115)

Felagið skuldi eisini fylgja við í seyðahaldi, sum var „Landets Styrke“, fuglaveiðu og grindadrápi. Í hesum skuldu „Uordener“, „Selvraadighed“ og „nederdrægtig Gjærrighed“ átalast, meðan seyðahaldið skuldi mennast, rættindini hjá bóndum til fuglaveiðuna verjast, og meira skil skuldi koma á grindadrápið við at trygd fekst fyri, at grindaboðini komu rætt millum bygdir, og at grindabátarnir høvdu rætta reiðskapin umborð.

Í hvørji bygd skuldu tveir menn veljast, sum skuldu koma til Havnar nakrar ferðir um árið at greiða felagnum frá, hvussu til stóð í bygdini, so „at Manglerne paa en lempelig Maade kunde erfares og raades Bod paa“. (Schrøter 1836: 116). Hinvegin skuldu teir flestu av limunum í felagnum eina ferð um árið vitja í teimum 4 sýslunum norðanfjørðs, og nakrir sunnanfjørðs. Hesar ferðir kundu best gerast, tá ið vártingini savnaðust, tí so kundu fólk koma til limir felagsins við sínum málum eftir tingfundin. Á henda hátt kundi felagið savna eina rúgvu av vitan um støðuna í landinum, og hvat gerast kundi. Felagið skuldi brúka vitanina til at skriva eina árliga frágreiðing til „det Høikongelige danske Kammer“ um landsins støðu, og um okkurt kundi „inventeres“, sum gagnaði landi og handli. At enda nevndi Lund í uppskotinum, at royndir áttu at verið gjørdar við landbúnaðaramboðum, sum vórðu nýtt aðrastaðni í ríkinum, og felagið átti at fingið ein garð at gjørt royndir á, tá ið ein varð tøkur (Schrøter 1836: 118).

Lund sendi hetta uppskotið til stjórnina í Keypmannahavn 6. mars 1772 saman við einum uppskoti um, at løgmansembætið varð niðurlagt, og at løgmansgarðurin varð seldur. Í staðin skuldi det økonomiske selskap taka sær av uppgávunum hjá løgmanni, og felagið skuldi eisini brúka renturnar av tí peninginum, sum sølan av garðinum gav, eins og felagið skuldi hava rætt til at gera landbúnaðarroyndir á garðinum (*Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission, nedsat i Henhold til Lov af 13/3 1908* 1911: 83).

Danske Cammer var áhugað í at fylgja uppskotinum hjá Lund, og stiftamtmaðurin tók eisini undir við tí, men í Kansellínum vann uppskotið ikki frama, tí tað helt, at brúk var fyri einum yvirdómara í einum so fjarum landsluti (Høgnesen 1968: 45). Í Keypmannahavn varð Struensee avrættaður 28. apríl 1772, og tá byrjaði sonevnda Guldbergska tíðin, har hugurin til at gjøgnumføra nýskipanir var minni (Olsen og Feldbæk 1990: 232).

### 4.11.4 Svabo ov bundin at fysiokratiskum hugsanum

Næsti føroyingur at gera vart við seg sum upplýsingarmaður, var prestasonurin Jens Christian Svabo, sum skrivaði fleiri rit um, hvussu bøtast kundi um búskapin. Jens Christian Svabo fór í 1765 til Keypmannahavnar at lesa náttúrufrøði og búskap saman við vinmanninum Nicolai Mohr, og hildið verður, at hetta vóru teir fyrstu føroyingarnir, sum fóru at lesa til annað enn prest. Í Keypmannahavn tók Svabo hugsanirnar hjá Landhusholdningsselskabet til sín, og hann vísir

*Jens Christian Svabo var ávirkaður av fysiokratisku hugsanunum í Det kongelige Landhusholdningselskab, sum var stovnað í 1769, meðan Svabo las í Keypmannahavn. Henda ávirkan sæst aftur í fyrstu bókini, sum Svabo skrivaði. Bókin æt* Kort ekonomisk Underretning om Kiødsaltning, Sviin, Kartofler og Haver Uddragen af andre til den Færøske Landmands Nytte.


Kort
økonomisk Underretning
om
Kiødsaltning,
Sviin, Kartofler
og
Haver.
Uddragen af andre
til den
Færøske Landmands Nytte
ved
J. C. Svabo.
I. Hefte.
Kiøbenhavn,
trykt hos Brødrene Berling.
1773.

viðhvørt í ritum sínum til búskaparfrøðingin Christian Martfeld, sum var skrivari í Landhusholdningsselskabet fyrstu mongu árini. Eitt dømi um hetta er, at hann í fyrstu bók síni brúkar eina ritgerð hjá Martfeld um ymisk viðurskifti í Írlandi. Í hesum sambandi lýsti hann Martfeld sum mann, ið hevði vunnið sær royndir og innlit uttanlands, og ritið hjá honum „er tillige kronet af et Sælskab, som giør Dannemark Ære.“(Svabo 1773: 17).

Ávirkanin frá fysiokratisku hugsanunum hjá Landhusholdningsselskabet sæst aftur í øllum ritverkinum hjá Svabo. Elstu ritini eru frá árinum 1773. Tað eina eitur „Tanker om Færöes Ekonomie og dens Forbedring“. Hetta er ein ritgerð, sum hann skrivaði í tað eintakið av orðabók síni, sum hann læt søgufrøðinginum P.F. Suhm (Svabo 1937: 211). Hitt ritið eitur „Kort ekonomisk Underretning om Kiødsaltning, Sviin, Kartofler og Haver. Udragen af andre til den Færøske Landmands Nytte“, og tað var halgað arvaprinsinum, tá ið tað kom út.

Svabo var fysiokratur um ein háls, og hann greiðir í innganginum til fyrra ritið frá, at hann ofta hevði hugsað um føroyska búskapin. Hann helt ikki, at nógv búskaparlig vitan skuldi til fyri at skilja, „at denne Kolonies Huusholdning er i de fleste Henseender af det forkeerte Slags, og at dens Forbedring maa forudsættes, inden man kan tænke Kolonisten lykkelig og Kolonien saa vigtig for Staten, som den kunde og burde være.“ (Svabo 1937: 212)

Í ritgerðini vísti Svabo á, at Philocosm hevði sagt um Ísland, at har átti fiskivinna at verið fremsta vinnan, og síðani kundi djórahald koma, og velting átti ikki at verið forsømd. Philocosm er helst eitt dulnevni fyri Martfeld. Svabo




*Í stóru frágreiðingini* Indberetninger, indhentede paa en, Allernaadigst befalet, Reise i Færøe i Aarene 1781 og 1782 *hevði Jens Christian Svabo nógvar hugsanir um, hvussu føroyska samfelagið kundi mennast. (Mynd: Kongaliga bókasavnið)*

dugdi ikki at meta um, hvørt henda hugsanin um Ísland var røtt, men hvørki Philocosm ella nakar annar kundi „med Billighed hentyde dette paa Færøe, eller give disse Næringer, som begge Kolonier have tilfælleds, samme Orden i Færøe." Hann ásannaði, at fiskivinna hevði verið høvuðsvinnan í Føroyum, men ikki var tað longur, og at djórahald var høvuðsvinna nú, men ikki átti at verið tað í framtíðini (Svabo 1937: 215). Skuldi føroyski búskapurin mennast, var neyðugt at koma har til, at „man kan Kalde Jord-Dyrkning den første Hoved-Næring for sin Visheds og Vigtigheds Skyld, Fædriften den anden, og endelig Fiskerierne den Tredie." (Svabo 1937: 216).

Henda niðurstøða hansara gjørdi, at tað nógva av tí, sum Svabo síðani skrivaði um búskaparlig viðurskifti, var knýtt at royndunum at menna landbúnaðin í Føroyum. Tað, sum hann hugsaði um fiskivinnu og menning av henni, tríva vit í aftur í kapitlinum um fiskivinnuna áðrenn 1830, men áðrenn Svabo heilt verður sleptur, er áhugavert at staðfesta, at hann hefti seg sera lítið við spurningin um einahandil ella fríhandil. Í Føroyafrágreiðingini frá 1781-82 segði hann kortini, at tað nú sá út til, at hugsanin var tann sama í Føroyum sum í teimum „fornemste Handels-Nationer", og hann helt, at Føroyar egnaðu seg betur til fríhandil, enn Ísland gjørdi, sjálvt um oyggjararnar vóru „endnu Ufuldkommen forberedet dertil". Í Føroyum hevði meira samband verið við aðrar handilstjóðir, og fólk høvdu fingið smakk fyri handli (Svabo 1976: 299).




*Í viðmerkingunum, sum kaptain Born skrivaði til ritgerðina hjá Svabo, kom ein greiður kapitalistiskur hugburður til sjóndar.*

**4.11.5 Born kommandantur ger viðmerkingar til Svabo**

Umframt fleiri smærri rit skrivaði Svabo eina stóra frágreiðing um Føroyar nevnd *Indberetninger fra en Reise i Færøe i 1781 og 1782*. Henda frágreiðing verður mett at vera týdningarmiklasta keldan til føroyska søgu í 18. øld, men frágreiðingin varð ongantíð prentað í samtíðini. Tí skuldi atgongd fáast til eitt av teimum sjey hondskrivaðu eintøkunum, sum vóru gjørd av frágreiðingini, um hon skuldi lesast.

Ein av teimum, sum las alla frágreiðingina gjølliga, var Born kommandantur, sum bæði las og í einum longri riti gjørdi viðmerkingar til hana, meðan hann var staddur í Keypmannahavn veturin 1789-90. Christian Ludvig von Born var av týskari ætt, men hann fór í 1762 18 ára gamal í danska hertænastu. 2. januar 1782 varð hann loystur úr hertænastuni og settur í starv sum kommandantur í Føroyum undir Rentukamarinum. Born var ávirkaður av rationalistiska rákinum, og tað sæst aftur í tí, sum skrivliga liggur eftir hann (Nolsøe og Jespersen 2004b: 128).

Born kommandantur er ikki minst áhugaverdur í sambandi við hesa ritgerðina, tí hann var kommandantur á Skansanum, og tað starvið gjørdist partur av uppgávunum hjá amtmonnunum, tá ið teir komu. Soleiðis var Born á ein hátt undangongumaður hjá amtmonnunum, og tí er áhugavert at síggja, hvørjar hugsanir hann hevði um, hvør rætti vegurin var at fara fyri at menna landið.

Í stuttari viðmerking um hugsanina hjá Svabo um fríhandil, segði Born, at hann enn einaferð mátti beundra Svabo fyri hansara „frimodige Tanker, hvori

han slet ikke ligner sine Landsmænd".[39] Tað er tí lítið at ivast í, at Born sjálvur var fyri fríum handli.

Í heila tikið var Born hugaður fyri allari nýskapan, og hann gramdi seg um, hvussu afturhaldin føroyski bóndin var. Í einum broti í viðmerkingum sínum til Svabo dregur hann saman um, hvussu støðan var, og hvat átti at verið gjørt við hana. Tað er í sambandi við, at hann skrivar um fólkatalið og greiðir frá, hví tað hjá føroysku bøndunum var neyðugt at hava so nógvar húskallar og arbeiðsgentur. Frágreiðingin var, at tað var stórur munur á donskum og føroyskum búskapi.

> Vore nærværende Fieldgang efter halv-vilde Faar |: som jeg før har lignet med en Klapjagt i Danmark |: vore Fiskerie og den Maade vi dyrke vores Jord paa, kræve mange Mandfolk; og vor Strømpe Manufactur, vore Haandqværne, vore elendige Vævestole, vor Kielenskab med vore Børn og endeel anden Huussyslen, mange Fruentimmer Hænder.

Og Born helt áfram um, hvat gerast kundi.

> – Men at alt dette kunde være anderledes, er unægtelig, thi naar vi Tid efter anden tæmmede vore Faar, og lod dem røgte af en Hyrde; naar vi forband vore Baads Fiskerier med dækkede Fartøier; naar vi pløiede vor Ager hvor vi kunde; naar vi brugte Lee og ingen Kniv; naar vi udvidede vor Indmark, og tog ikke mere Udmark end vi kunde oversee og bedre røgte begge Deele; naar vi forbedrede Machanismen ved Fabriquer at forarbeide eendeel af vores Uld; naar vi indførte Vævstole og forøgede vores Vand Møller; naar vi anlagte Skoler for vore Børn, kielede mindre for dem og vandte dem fra Ungdommen af til Arbeide, da er jeg vis paa, at der var Folk nok i Færøe, om der ogsaa var halv saa mange Gaarde, som der er nu, og at der kunde blive vundet meere med samme Hænder. - At der imidlertid ved bedre Indretninger kunde været ligesaamange Indbyggere paa Færøe som paa Hitland, hvor man regner over 20000 Mennesker, endskiønt dette Land ikke er større og frugtbarere som Færøe, troer jeg at være uden al Tvivl.[40]

Born umboðar í hesum viðmerkingunum heilt greitt ein øðrvísi hugburð, enn Ulrik Adolf Lund hevði gjørt, tá ið hann gjørdi viðmerkingar til búskaparligu hugsanirnar hjá Debes løgmanni. Hann var fyri teirri kreativu niðurbrótingini, sum kravdist fyri at koma inn á eina nýggja rás við framburði, sum kundi lyfta Føroyar upp á støði við Hetland. Meðan Lund royndi at halda aftur í sínum viðmerkingum, royndi Born at koyra meira á, enn Svabo sjálvur hevði gjørt. Born umboðar nýggju tíðina og átók sær leiklutin hjá tí modernaða embætismanninum,

---

39 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 40. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.

40 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 21. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.

meðan Lund umboðaði gomlu tíðina og als ikki dugdi at síggja aðrar møguleikar enn galdandi skipan við Einahandlinum í miðdeplinum.

## *4.12 Fyrsta royndin at innføra fríhandil*

Henda hugburðin tók Born við sær í nevndararbeiðið, sum hann í 1789 varð biðin um at koma at taka lut í. Nevndin, sum í 1787 varð sett at realisera ognirnar hja íslendska handlinum, fekk nevniliga 1. juli 1789 boð um at finna saman í eina nevnd saman við kommandantinum og fútanum í Føroyum at viðgera, hvussu føroyski handilin kundi frígevast, ella hvussu hann skuldi halda fram sum kongligur handil (Thorsteinson 1822: 64).

Hammershaimb fúti og Born kommandantur fóru báðir til Keypmannahavnar at taka lut í nevndararbeiðinum, men í Føroyum frættist skjótt, hvør ætlan var í umbúnað, og her var áhugin lítil fyri at avtaka Einahandilin. Tvørturímóti óttaðust nógv fyri avleiðingunum, og tað fekk eysturoyingar at taka seg saman til at skriva eitt mótmælisskriv og umbøn til kong, sum Born kommandantur kundi taka við sær til Danmarkar.

Í skrivinum vóru allir eysturoyingar bidnir um at standa saman sum ein maður í áheitan á kong um at sleppa undan fríum handli, sum nú var i umbúnað, "da vi fattige Indbyggere ej kan vente andet end Ulykke da at ramme os." Skrivið fór úr bygd í bygd, áðrenn sýslumaðurin skuldi lata kommandantinum tað. Tað kom ikki í allar bygdir, men um tað komst av, at fólk har ikki tóku undir við skrivinum, ella skrivið bara ikki náddi at koma runt, áðrenn neyðugt var at fáa tað sent avstað, er torført at siga nakað um. I flestu bygdum vóru tað 2-4 bøndur, sum skrivaðu undir vegna alla bygdina, og stóru bøndurnir á Oyri, á Glyvrum og í Lamba orsakaðu ómakin, sum teir bóðu Born gera, men samstundis bjóðaðu teir sær eisini til at undirvísa teimum høgu harrunum „om Landets Beskaffenhed" komandi vár (Mortensen 1955: 52–53).

Nevndararbeiðið endaði 15. juni 1790 við einum áliti um framtíðar handil í Føroyum. Í álitinum verður á fyrsta sinni grundgivið fyri, hví fríhandil og avtøka av Kongliga einahandlinum var tað rætta fyri føroyska samfelagið. Tað gjørdist eisini høvuðsspurningurin í øllum kjaki um handil og framburð í Føroyum komandi hálvu øldina, og tí er neyðugt at lýsa sjónarmiðini hjá nevndini.

Formliga var endamálið við nevndararbeiðinum at finna fram orsøkina til, at handilin hevði givið so stórt undirskot síðstu árini, og koma við einum boði uppá, hvussu „dette kunde forebygges i Fremtiden." Nevndin roknaði seg fram til, at handilin hevði upparbeitt eina skuld upp á 158.534 ríkisdálar og 75 skillingar árini 1781-1788. Eftir at hava gjørt fleiri útrokningar, kom nevndin til ta niðurstøðu, at „Aarsagen til Tabet stikker fornemmelig i det meget upassende Forhold i mellem Taxten paa den oversendte Kargaison, til det, som den virkelig koster." Tað var altso gamli taksturin frá 1691, sum var orsøkin. Hinvegin helt

nevndin ikki, at stórvegis trupulleikar vóru av útflutningsvørunum, sjálvt um tær okkurt árið eisini góvu undirskot.

Loysnin var at seta prísin á innflutningsvørum upp, so hann samsvaraði við konjunkturarnar á marknaðinum. Tað helt nevndin ikki vera nakran trupulleika, tí hon segði:

> At dette kunde skee uden at Indbyggerne ruineres, derom kan neppe være nogen Tvivl, naar man betænker, at Kvægavlen ere saa meget betydelig paa disse Øer, at de fremmede Varers Forbrugelse uden nogen Fare kunde indskrænkes, forsaavidt Landets Beboere ikke meere fandt deres Regning ved at betale dem til høiere Priiser. Desuden haves her adskillige Næringsveie, som anseelig vilde udviides saa snart Indbyggerne ved høiere Priser paa fremmede Varer saae sig nødte til at fordobble deres Industrie, og i denne Betragtning, kunde man endog paastaae, at saadan Forandring vilde blive til stor Fordeel for Landet.

Í hesari útsøgn liggur, at nevndin helt, at kunstiga lági vøruprísurin gjørdi, at føroyingar gjørdu minni við framleiðsluna, tí at tað var lættari at keypa seg til tað, sum tørvur var á. Á tann hátt kom undirskotið hjá handlinum í veruleikanum at virka sum ein stuðul til føroyingar, men afturfyri forðaði hesin stuðulin fyri, at gongd kom í neyðugu vinnumenningina. Við øðrum orðum bar til við príspolitikki at fremja eina kreativa niðurbróting, sum breyt gamla siðvenju og setti gongd á nýggja vinnu.

Hetta var eitt liberalistiskt sjónarmið, og nevndin var sannførd um, at handilsfrælsi var einasti rætti vegurin. Tað var tað, teoriin mælti til, og teoriin var síðstu árini „saa fuldkommen bestyrket ved den Erfaring man har giort ved andre Danske Provinser, hvis Handel forhen blev dreved paa samme Maade som den Færøiske."

Um føroyingar helt nevndin, at langa tíðin við einahandli hevði gjørt, at teir høvdu „en indskrænket Tænkemaade", eins og øll onnur høvdu fingið undir líknandi umstøðum. Sjálvt um Føroyar vóru vælegnaðar til eplavelting, gjørdist tað ikki vanligt, „deels for gamle Fordommes Skyld, deels fordi Bonden ikke finder det Umagen værd at dyrke Jorden med nogen Flid." Tað sama bar til at siga um fiskivinnu, sum nógv meira kundi verið gjørt við, um handilin ikki „aldeles nedtrykkte Industrien, ved den Forvising som den altid medfører, at Handelen dog tilsidst maae Føde Indbyggerne, hvad enten de ere stræbsomme eller efterladne, men alt dette vil blive ganske anderledes under en Friehandel, siden Indbyggerne saa at sige først da kunde have Interesse ved at være dristige og virksomme."

Umframt at økja um veltingina og fiskivinnuna fór fríhandilin eisini at gagna kolavinnuni í Suðuroynni, og nevndin sá eisini stórar møguleikar í Føroyum sum entrepot handilsstøð, har til bar at hava eitt „oplag av Varer, hvorfra de andre Kolonier kan forsynes i Paakommende uforvæntede Tilfælde." Føroysku vørurnar høvdu ikki stóran týdning fyri ríkið, men tær vóru kortini verdar umleið 30.000

ríkisdálar, og tað var „reen national Gevinst", sum helst kundi økjast nógv, tá ið betri gongd kom á fiskivinnuna.

Nevndin ásannaði, at fleiri mótmæli vóru móti fríum handli, men hon helt ikki, at har var nakað at óttast. Føroyingar høvdu í øldir livað í vissu um, at vøra fekst til keyps, og ein slík broyting fór at gera, at tey „blive aldeles Forstyrret i deres vante Levemaade." Tí mælti nevndin til, at „Friehandelens Begyndelse foranstaltes med den fornødne Forsigtighed."

Áheitanin frá eysturoyingum ávirkaði nevndina, og hon helt, at fólk, sum høvdu verið "aldeles isoleret" í so langa tíð, „ere overmaade hengivne til det gamle" og ímóti øllum nýggjum. So stór var henda mótstøðan móti tí nýggja, at „allene Nyeheden er tilstrækkelig Aarsag for at forkaste en i sig selv god og nyttig Forandring." Henda støðan gjørdi, at vandi var fyri, at øll mistu mótið, um tað ikki beinanvegin vísti seg, at fríhandilin skapti framgongd. Tí skeyt nevndin upp, at kongur avgjørdi at avtaka Einahandilin, men fyribils skuldi hann halda fram í 5 ár. Tó skuldu takstirnir broytast, so at teir í høvuðsheitum vórðu settir eftir miðalprísunum á vørunum seinastu 5 árini, og atlit skuldu takast fyri, at neyðsynjarvørur og vørur, sum skuldu nýtast í framleiðsluni, ikki hækkaðu ov nógv.

Henda skipanin líktist teirri skipan, sum varð gjørd fyri íslendska handilin í 1776. Tað var ein skipan, sum skuldi endurspegla prísirnar á evropeiska marknaðinum og samstundis gjørdi upp við gomlu prísskipanina ella príslistarnar frá 1619, 1684 og 1702. Í íslendska bóndasamfelagnum vóru nógv mótmæli móti hesi nýggju skipanini (Gunnarsson 1983: 152).

Sama skipan skuldi galda fyri útflutningsvørurnar, og útrokningarnar hjá nevndini vístu, at tað hevði við sær, at prísurin á fjøður, tálg, fiski og lýsi nærum tvífaldaðist. Tað var ein stórur fyrimunur, tí tað fór at eggja íbúgvunum til at fáa meira av hesum vørum til vega, og við eini slíkari øktari framleiðslu „vil de naturligviis bedre end paa nogen anden Maade sættes i Stand til i sin Tiid at kunne benytte dem af Friehandelens Fordeele, heldst dersom Fiskeriet skulde betydelig tiltage hvilket vil blive en Sag af yderste Vigtighed." Sjálvt um hesar vørurnar hækkaðu í prísi, tordi nevndin ikki at lækka prísin á hosum so nógv, sum skipanin legði upp til, tí tær vóru meginparturin av landsins framleiðslu. Hækkingin á kornprísinum gjørdi kortini, at 14½ hosupar skuldi til eina tunnu av byggi, sum áður fekst fyri 12 pør. Nevndin endaði partin um útflutningsvørurnar við at siga:

> Og om Handelen, imod Formodning, i de næstpaafølgende Aar skulde lide nogen Skade paa disse Artikler, saa synes dog i det heele det Princip, at tilveiebringe en større Production, ved en nogenledes fordeelagtig Priis paa Retourvarerne, at være i sig selv saa vigtig og saa fordeelagtig ikke allene for Færøernes Indbyggere, men ogsaa for den heele National-Handel, at vi tør smigre os med den Forhaabning, at den foreslagne Foranstaltning vil finde Deres Mejestæts allernaadigste Bifald. Havde man derimod endnu meere forhøiet Priiserne paa Kornvarerne, eller ikke

foreslaaet saa gode Priiser for Strømperne, saa maatte man billig frygte for at Indbyggerne vilde for meget trykkes.

Tá ið fríhandilin nú skuldi bíða í fimm ár, loyvdi nevndin sær at koma við nøkrum uppskotum um, hvussu Føroyar skuldu fáa størri gagn av fríhandlinum, tá ið hann kom. Hesi uppskotini høvdu øll til endamáls at bera landið longri fram á fleiri økjum, og tí var talan í veruleikanum um eina víðfevnda moderniseringsætlan[41]. Uppskot vóru um, hvussu skuldin í handlinum kundi minkast, og hvussu ullvinnan, kolavinnan og landbúnaðurin kundu mennast. Harumframt varð mælt til at gera topografiskar uppmátingar og kort av Føroyum, og skotið varð upp at lata ein handil upp í Trongisvági, eins og fremmandir handilsmenn skuldu sleppa at byrja í Føroyum undir serligum treytum. Hernaðarliga skuldu Føroyar mennast við eini landmilits, men tað helst áhugaverdasta úr einum moderniseringssjónarhorni var, at nevndin skeyt upp at stovna ein borgaraskúla í Havn.[42] Skúlaðir borgarar vóru fundamentalur partur av broytingini, sum skuldi koma.

Hetta álitið var grundarlagið undir kongligari resolutión frá 13. august 1790. Í innganginum í resolutiónini stendur, at „saa er Kongen til Sinds, fra 1. Jan. 1796 af, aldeles at ophæve den monopoliske Handel paa Færøerne, og at frigive samme for samtlige Kgl. Undersaatter." Í sama inngangi verður fyriskipan frá 30. mai 1691 avtikin, og henda nýggja resolutiónin ásetti nýggjan handilstakst (Mortensen 1955: 58).

Men eingin fríhandil kom í 1796, og ein orsøk var, at konjunkturarnir vóru alt annað enn góðir. Fraktkostnaðurin var farin nógv upp, og korn og aðrar neyðsynjarvørur vóru eisini hækkaðar nógv í prísi, og samstundis var prísurin á føroysku vørunum fallin á danska og altjóða marknaðum (Thorsteinson 1822: 68–69). Orsøkin til prísvøksturin var í hvussu er partvíst krígsstøðan, sum kom í eftir Fronsku kollveltingina, og ídnaðarkollveltingin í Onglandi, sum í stóran mun bygdi á klædnaframleiðslu, gjørdi, at prísurin á klædnavørum fall. Í klædnaídnaðinum í Onglandi gjørdist bummull vanliga rávøran heldur enn seyðaull, og tað hevði við sær, at prísirnir á klædnavørum fullu nógv, og tað ávirkaði eisini prísirnar á føroysku hosunum. Tá ið prísurin so heldur ikki longur varð vardur av gomlu takstunum, endaði tað við, at hosuframleiðslan at kalla hvarv síðst í 18. øld (Johansen 1997: 71).

Eingin roknaði við, at nakar handilsmaður fór at vera áhugaður í at taka við handlinum, og í Føroyum óttaðust fólk fyri vørumangli. Tí søktu føroyingar um at sleppa undan fríhandlinum, og bæði á ólavsøkutingi 1793 og í brøvum mótmæltu føroyingar fríum handli (Nolsøe og Jespersen 2004b: 38). Tá ið sorinskrivarin Lauritz Olsen ferðaðist runt á vártingini í 1795 bóðu fólk hann

41 Hesi uppskotini eru neyvari viðgjørd í (Nolsøe og Jespersen 2004b: 30–38).

42 Allur hesin parturin um nevndarálitið byggir á álitið sjálvt. Her er avskrivaða útgávan, sum er gjørd til 1800-tals projektið, nýtt.



*Føroyingar vildu í 1795 varðveita einahandils-skipanina, og teir fingu Lauritz Olsen sorinskrivara at skriva kongi eina áheitan um at steðga ætlanunum um at avtaka Einahandilin.*
*(Mynd: Frøði 2/2017)*

skriva til kongs um at steðga ætlanini at avtaka Einahandilin. Sorinskrivarin tók áheitanina til eftirtektar og skrivaði vegna „samtlige Færøernes Almue“, at tey óttaðust fyri, at ein slík broyting í handlinum fór at verða teirra „Ødelæggelse og Undergang.“ (Guttesen 2017a: 37).

Handilsstjórnin ásannaði, at konjunkturarnir neyvan kundu verið verri, og tí avgjørdi hon at bíða við fríhandlinum í eitt ár. Tá ið tað í 1796 ongantíð sá út til, at støðan fór at batna, endaði tað við, at avgerð varð tikin um at halda fram við handlinum eftir fyriskipan frá 1790. Tað varð kunngjørt við kongligari resolutión 21. desember 1796 (Degn 1929: 102), og nógv bendir á, at áheitanin frá føroyingum var ein týðandi grundgeving hjá kongi fyri at taka undir við hesari avgerð (Guttesen 2017a: 37).

Málið varð fleiri ferðir umrøtt í tíðini eftir 1796. Í 1798 fekk nevndin „Den færøske og grønlandske Handels Kommission“ til uppgávu at kanna møguleikarnar fyri fríhandli, men hon kom ongantíð við nøkrum uppskoti.

Um aldaskiftið 1800 var uppboðssøluprísurin á føroysku vørunum lágur, og tað var bara ein stór rúgva av lýsi og fiski, sum fingu góðan prís og harvið dekkaðu tapið upp á útflutningsvørur tað árið. Í 1801 kostaði tað 44.129 ríkisdálar at keypa vørur inn, men taksturin gav bara 34.648 ríkisdálar. Tapið var tí 9.481 ríkisdálar, og við fraktini á 8000 ríkisdálar omaná gjørdist samlaða tapið av innflutninginum umleið 17.500 ríkisdálar. Men torført var at leggja fleiri útreiðslur á íbúgvararnar. Nevndin, sum viðgjørdi takstirnar í 1801, mælti tí til at hækka prísirnar á teimum vørum, sum góvu undirskot, men kornprísurin skuldi framvegis haldast undir vanliga støðinum. Nevndin mælti eisini til, at taksturin bara var galdandi fyri

eitt ár, og hon brúkti eisini grundgevingina við, at nýggju prísirnir fóru at vera til fyrimuns fyri fyrireikingarnar til fríhandil (Joensen 1981: 58). Eftir tað var taksturin settur av nýggjum á hvørjum ári fram til kríggið, og eftir 1814 helt henda skipan fram heilt til 1856 (Joensen 1981: 59).

So seint sum beint fyri kríggið í 1807 varð ætlanin um fríhandil frammi, men tá varð niðurstøðan, at føroyingar „endnu ikke vare tilstrækkeligen forberedte til at modtage en Frihandel,“ og ein onnur grundgeving var, at handilin læt hernaðardeildunum hosur og troyggjur fyri rímiligan kostnað, og henda fyrimunin misti kongligi kassin við fríum handli. (Thorsteinson 1822: 69). Tað árið vóru tríggir føroyskir bøndur hjá kongi í Kiel fyri at søkja um at varðveita Einahandilin (Nolsøe og Jespersen 2009: 202).

At handilin ongantíð varð avtikin, verður vanliga forklárað við konjunkturum, sum ikki gingu rættan veg, men sjálvt um tað ikki verður nevnt, so heldur Hans Andreas Joensen, at ein onnur grundgeving helst eisini var, at stjórnarmyndugleikarnir óttaðust fyri, hvussu fór at gangast við Danmarkar suveræniteti yvir Føroyum, um handilin gjørdist fríur (Joensen 1981: 68). Ein annar vansi við at avtaka Einahandilin var, at hann røkti so nógvar almennar uppgávur og skyldur. Hann var kassi hjá tí almenna og tók soleiðis bæði móti skatti og betalti pening út til fátøk og onnur, sum tað almenna vildi samsýna. Tá ið fríhandilin kom, skuldu allar hesar almennu uppgávurnar skipast av nýggjum.

## *4.13 Napoleonskríggini*

Í tíðini beint áðrenn Danmark endaði í kríggi, hendu broytingar í føroyska útflutninginum, tí føroyingar fóru í nógv størri mun at binda troyggjur heldur enn hosur til útflutnings. Árini 1792-1801 keypti handilin 3474 troyggjur, sum svaraði til 0,6 % av samlaða útflutninginum, men nýggja handilslógin loyvdi íbúgvum sjálvum at útflyta tær vørur, sum ikki vóru nevndar í takstinum. Troyggjur vóru ikki takstvøra, og tá ið handilin sá, at privati útflutningurin av hesi vøruni øktist í stórum, tók handilsstjórnin í 1807 avgerð um at taka troyggjur upp í takstlistan og samstundis banna allari privatari sølu av troyggjum (Joensen 1981: 41). Soleiðis gjørdust troyggjur høvuðsútflutningsvøra hjá handlinum í 19. øld (Nolsøe og Jespersen 2009: 11).

Tá ið bretar lupu á Keypmannahavn í september 1807, helt alt kjak um frían handil í Føroyum uppat. Samstundis byrjaði ein torfør tíð, har tað var ógvuliga trupult hjá farmaskipunum at koma vegin fram, og fleiri handilsskip, sum skuldu koma við korni, vórðu tikin av bretskum kaparum (Guttesen 2016: 4). Tí var vørutrot í handlinum, og hungursneyðin hótti. Støðan batnaði ikki, tá ið bretskir kaparar lupu á Havnina og tóku allar vørurnar í handlinum.

Ein avleiðing av krígnum var, eins og tað seinni skuldi vísa seg aftur bæði undir fyrra og seinna veraldarbardaga, at Danmark ikki megnaði at halda uppi

sínum yvirvaldsrætti yvir londunum í Norðuratlantshavi. Tað gjørdi, at hjálp mátti fáast úr Bretlandi. Undir krígnum fekk eitt bretskt handilshús, Horne & Stackhouse, tí loyvi at handla í Føroyum. Tá ið kríggið var liðugt, søkti tað um at sleppa at halda fram, og tað fekk loyvi til at handla í 1815, men eftir tað skuldi felagið avvikla síni viðurskifti í Føroyum (Nolsøe og Jespersen 2004b: 66). Løbner kommandantur helt, at virksemið hjá Savignac, sum arbeiddi fyri handilshúsið, var skaðiligt fyri bæði land og handil, men Schrøter prestur helt, at sjálvt um tað hevði verið ein trupulleiki fyri Einahandilin, so hevði tað eisini breitt út ein frísinnaðan anda og ídnað í Føroyum, sum m.a. fekk munandi gongd á eplaveltingina (Nolsøe og Jespersen 2009: 219).

Henda krígsstøðan er áhugaverd í samband við javnvágsfelluna, tí hon gjørdi, at veiki staturin ikki megnaði at røkja sína uppgávu. Tað slapst tí ikki undan at lata onnur sleppa framat at hjálpa, og á tann hátt noyddist staturin at lata javnvágsfelluna eitt sindur upp. Tá ið kríggið var liðugt, var kommandanturin skjótur at tippa hetta holið aftur, men bara tað, at eitt einstakt handilshús hevði fingið møguleikan at handla í Føroyum hesi fáu árini, hevði stóra ávirkan á bæði fólk og framleiðsluna í landinum. Týdningurin hetta fekk fyri útbreiðsluna av eplavelting skal ikki undirmetast, tí eplaveltingin hevði stóra ávirkan á fólkavøksturin, og fólkavøksturin gjørdi sítt til at spreingja teir karmar, sum gamla bóndasamfelagið virkaði í (Isholm 2014).

## *4.14 Einahandilin yvirlivir enn eina nevndarviðgerð*

Longu áðrenn kríggið endaði, noyddist danski staturin í 1813 at ásanna, at inflatiónin undir krígnum hevði gjørt, at virðið á pengaseðlunum mátti lækkast, soleiðis at ein ríkisdáli í gomlum seðlum var ein mark verdur í nýggjum seðlum, ella 1/6 av tí, hann upprunaliga hevði verið verdur (Olsen og Bjørn 1990: 116). Stutt eftir misti Danmark Noreg í friðarsamráðingunum í Kiel, og tað gjørdi, at Danmark ongan áhuga hevði í at missa fleiri av sínum kolonium og bilondum, men vildu verja væl um tann territoriala integritetin, sum krúnan setti so stóran prís uppá (Johansen 1997: 79).

Tá ið kríggið var liðugt, kom gongd á allan vanligan búskap kring um í Evropa. Í flestu londum var hend ein nýskipan av landbúnaðinum, og tað hevði við sær, at londini framleiddu meira og tí høvdu minni tørv á at innflyta landbúnaðarvørur. Samstundis fóru fleiri lond undir at seta tollmúrar upp fyri at verja egið vinnulív. Umframt at minka um útflutningin hevði tað við sær, at danski handilsflotin ikki megnaði at gerast líka stórur aftur, sum hann hevði verið í 1807, og í so máta gjørdi tað ikki støðuna betri, at Danmark hevði mist Noreg, og at handilin við Eysturasia so at siga steðgaði upp. Í Keypmannahavn fóru hópin av fyritøkum, sum einaferð høvdu verið stórar, á heysin, og landbúnaðurin var hart raktur av fallandi prísi (Olsen og Bjørn 1990: 143–147).



*Íslendski amtmaðurin Bjarni Thorsteinsson helt 14. februar 1821 fyrilestur um handilin í Føroyum í felagnum Landhusholdningsselskabet. (Mynd: wikicommons)*

Einaveldið royndi at bjarga fleiri av fyritøkunum, sum vóru um at fara á heysin, við lánum og skattalættum, men tað var, sum Per Boje hevur víst á, ein „forgæves kamp mod kreativ destruktion", og tað var bara gott, tí tað gav møguleikar fyri, at nýtt virksemi kundi sleppa framat. Einaveldið var ávirkað av búskaparkreppuni, men tað helt áfram at útbyggja infrakervið og menna útbúgvingarøkið, eins og tað royndi at eggja til innanlands kapping, at verja móti útlendskari kapping og at fremja átøk, sum kundu føra til framleiðslu av nýggjum vørum (Boje 2014: 254).

Undir hesum umstøðum skuldi eingin ivi verið um, at danskir myndugleikar eisini vildu hava Einahandilin í Føroyum avtiknan, og í 1816 fekk ein nevnd, sum hevði til uppgávu at finna út av, hvussu íslendski handilin kundi gerast heilt fríur, eisini til uppgávu at geva Rentukamarinum uppskot til, hvussu føroyski handilin kundi mennast. Løbner amtmaður varð biðin um at koma við sínari hugsan, um Føroyar beinanvegin ella innan eina ávísa tíð vóru skikkaðar at taka ímóti fríhandli. Amtmaðurin hevði fingið úttalilsir frá sýslumonnunum, Schrøter presti og fútunum Hammershaimb og Majer, og hansara niðurstøða varð, at „Færøerne ere ikke skikkede til og Indbyggerne ikki tjente med en frigivet Handel." (Degn 1929: 106). Í *Havnar søgu 3* hava Nolsøe og Jespersen ávíst, at tey, ið vóru væl fyri árini 1815-1819, fingu so góðan prís í handlinum fyri ullvørurnar, at tað fekk tey til at vilja varðveita Kongliga einahandilin. (Nolsøe og Jespersen 2009: 221), og Sámal Tróndur Finsson Johansen heldur eisini, at føroyskir valdsharrar vildu steðga donsku ynskjunum um at geva handilin leysan (Johansen 1997: 79). Úr Føroyum kom sostatt einki ynski um at gera broytingar í handilsskipanini.

Áðrenn nevndin var liðug við arbeiði sítt, helt Bjarni Thorsteinsson, amtmaður í Íslandi, 14. februar 1821 fyrilestur í Kongelige Landhuusholdningsselskabet um handilin í Føroyum. Hann tók í fyrilestrinum fram tað, sum var sagt um fyrimunirnar við fríhandli, so sum at hann hevði týdning fyri at menna tjóðarinnar ídnað, upplýsing og siðir, og tað vóru alt øki, har føroyingar vóru langt afturúrsigldir. Hann nevndi eisini, at meira kundi fáast burtur úr landbúnaðinum, fiskivinnu og kolavirkseminum, sum øll vóru á lágum blussi, og at fríhandil fór at kveika nýtt lív í oyggjunum at menna verandi og at finna nýggjar vinnuvegir (Thorsteinson 1822: 81–82).

Vansarnir við fríum handli í Føroyum vóru, at „Handelen paa disse Øer er endnu, og maaske vil det altid blive saaledes, af et saa ubetydeligt Omfang, at den ei kan frigives.“ Avmarkaða støddin á handlinum gjørdi, at hon megnaði ikki at halda uppi nakrari handilsligari kapping (Thorsteinson 1822: 84). Støddin á landinum gjørdi eisini, at „Øernes Produktion og Folkemængde kan vel noget forøges; men, efter Jordbund, Clima og andre deslige Omstændigheder, maa denne Velstandens Forøgelse blive ikkun langsom; den er tillige, i Følge Næringsveienes naturlige Beskaffenhed, i høi Grad usikker.“ Í so máta vóru Føroyar verri stillaðar enn Ísland, tí um veðrið var vánaligt okkurt ár, so rakti tað alt landið, meðan Ísland var so stórt, at um okkurt gekk galið í einum enda av landinum, so kundi alt standa í besta blómu í hinum endanum. Tí fóru handilsmenn at rýma, tá ið eingin útflutningsvøra var at fáa, og so endaðu Føroyar í einari støðu, har handilin endaði í hondunum á einum einstøkum manni, og tá hevði støðan verið líka ring sum undir Einahandlinum og „uden al Tvivl meget mere trykkende for Indbyggerne.“ (Thorsteinson 1822: 85). Hesir báðir vansarnir, at landið var ov lítið, og at vandi var fyri, at almenna monopolið fór at verða avloyst av einum privatum monopoli, vóru tvær av teimum týdningarmiklastu grundgevingunum fyri at halda fast í Einahandlinum heilt fram til avtøkuna í 1856.

Sjálvt um vansar vóru við fríhandli ásannaði Thorsteinsson, at verandi handil gjørdi, at føroyingar „nødvendigen maae i flere henseender behandles sum Umyndige,“ og um hildið varð fast í, at fríhandil fór at gagna bæði stati og fólki, so var tað í hvussu er ikki rætta tíðin at gera tað í, og „der maatte først iværksættes flere Forberedelser, som allerede før have været paatænkte, men endnu ikke ere blevne udførte.“(Thorsteinson 1822: 90).

Her hugsaði Thorsteinsson helst um tær ætlanirnar, sum vóru nevndar í fyriskipanini frá 1790, men hesar orðingar minna eisini nógv um tað, sum Chakrabarty hevur nevnt „Waiting room of history“, har hjálandaveldi velja at bíða við at fremja broytingar í hjálondum, til fólkið í hjálandinum er gjørt klárt til tær. Trupulleikin er bara, at rætta løtan ongantíð kemur, og tí verða broytingar ongantíð framdar, og í hvussu er ikki fyrr enn okkurt heilt annað ávirkar søgugongdina. Heilt so galið gekst ikki í Føroyum, og tað er kanska eitt gott dømi um, at Føroyar ikki vórðu viðgjørdar sum eitt hjáland, sjálvt um tað mangan kann tykjast soleiðis í søguligum skjølum.




*Í nevndini, sum viðgjørdi føroyska handilin í 1821, mælti Hans Leganger Wexelsen til, at føroyski handilin varð gjørdur fullkomiliga fríur. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Sjálvur hevði Thorsteinsson trý hugskot til, hvussu fríhandil í Føroyum kundu fyrireikast. Tað fyrsta var at stovna eina ella tvær handilsstøðir afturat Tórshavn. Annað hugskotið var at seta takstirnar soleiðis, at teir fylgdu marknaðarprísunum so neyvt, sum til bar. Triðja uppskotið var at kunna almenningin um málið, tí sum støðan var, var føroyski handilin mestsum ókendur í handilsheiminum (Thorsteinson 1822: 90–91). Hetta vóru hugskot, sum hann helt, at det kongelige landhusholdningsselskab skuldi arbeiða víðari við (Thorsteinson 1822: 92). Í hvussu stóran mun, Thorsteinsson hevur ávirkað nevndina, sum umrøddi føroyska handilin, ella um nevndin hevur ávirkað hann, er ógjørligt at siga, men tá ið nevndin 14. juli 1821 var liðug við arbeiði sítt, sóust í hvussu er tvey av uppskotum Thorsteinssons aftur.

Í áliti sínum byrjaði nevndin við at greiða frá teimum tilmælum, sum vóru komin til hennara. Justitsráð Wexelsen, sum var limur í stjórnini fyri føroyska handilin, viðmælti, at handilin var gjørdur fullkomiliga fríur. Hansara grundgevingar vóru, at handilin hevði gjørt føroyingar apatiskar búskaparliga, og handilin var heldur ikki gagnligur fyri kongliga kassan, tí skuldin var í 1801 komin upp á 140.000 ríkisdálar, og hon var undir krígnum økt við 216.000 ríkisdálum afturat. Hann helt eisini, at handilin var bara „tuskhandil“, og tí setti hann ongan kapital í ringrás. Hann kundi tí ikki eggja til uppsparing ella til nýtt og økt virksemi. Vexelsen helt, at handilin skuldi gerast fríur eisini fyri útlendingar, tí tað fór ikki at bera til at halda teimum burtur kortini, og teir fóru at kunna selja fleiri vørur bíligari, enn danskir handilsmenn megnaðu. At enda helt hann, at tað var lætt

at realisera handilin, tí hann átti ongi skip, og handilshúsini vóru løtt at selja. Hinir limirnir í handilsstjórnini hildu eisini, at handilin skuldi frígevast, men treytin var, at tað bara var gjørt fyri danskar ríkisborgarar.

Løbner amtmaður helt ikki, at „Færøerne vilde være tjente med Frihandel, uden nærmere Forberedelse, om end Fremmede aldeles bleve udelukte." Sum fyrireiking skeyt hann upp, at handilsstøðir vóru stovnaðar í Vági og í Vestmanna, men hann helt, at fólk bara skuldu hava loyvi at koma til handilin ávísar tíðir á árinum, „for ikke at spilde Tid". Hann helt, at føroyingar skuldu eggjast til at fáa sær deksfør til flutning og fiskivinnu, og hann hevði eisini uppskot um at stovna lím- og sápukókarí. Harumframt skuldu føroyingar fyri egna rokning sleppa at útflyta lýsi og fisk, og handilsstjórnin átti at gjørt eina roynd at senda eitt skip „paa Speculanthandel", sum føroyingar síðani kundu fáa loyvi til, so at íbúgvarnir á tann hátt kundu venja seg til at fáast við handil.

Handilsstjórnin viðmerkti um uppskotini hjá Løbner, at tað fór at kosta handlinum ov nógv at hava fleiri handilsstøðir, fiskivinna við egnum deksførum var vandamikil, tí hon eggjaði til loynihandil, og at enda helt hon ikki, at tað var nakað gott hugskot at royna eina Speculanthandelsexpedition, tí tað fór annaðhvørt at oyðileggja handilin ella privatu entreprenørarnar.

Niðurstøðan hjá nevndini gjørdist tí, at hon ikki helt, at tað „for Øjeblikket" var ráðiligt at gera handilin frían, serliga ikki fyri fremmandar tjóðir. Hetta síðsta er ikki minst áhugavert, tí nevndin grundgav við at siga, at handil í Føroyum var nógv lættari at reka úr Skotlandi ella Noregi enn úr Danmark, og „disse vilde da snart fortrænge den danske Handel," og tá hvarv so at siga alt eftirlit eisini. Ein vansi var, at allur føroyski handilin fór at kunna rekast av einari útlendskari fyritøku, og tað fór at føra til „mange Misbrug". Tolleftirlit var torført, tí talan var um so nógvar oyggjar, og handilin var so lítil, at hann neyvan megnaði at gjalda fyri eitt slíkt eftirlit. Nevndin helt eisini, at „overgangen paa eengang fra den fuldkomneste Ufrihed til den største Handelsfrihed er ogsaa i sig selv meget betænkeligt."

Eitt enskt handilshús hevði søkt um at sleppa at stovna handil og fabrik í Føroyum, og keypmenninir la Mesurier, W. Contet og A. Douglas í London høvdu eisini søkt um at sleppa at reka kolanámini í Føroyum og aðra slíka vinnu og „alt slags Havfiskeri i det Store." Nevndin mælti frá at geva loyvi til hesar umsøkjarar, m.a. tí at kolavinna og havfiskarí vóru vinnur, sum ynskiligt hevði verið, at føroyingar sjálvir fóru undir. Fingu hesir bretar loyvi, hevði tað lættliga endað við, at føroyingar blivu „underkuede af fremmede og formuende Kjøbmænd."

Nevndin var meira opin fyri at lata handilin upp fyri danskar ríkisborgarar, men tað „vilde dog næppe for Tiden svare til Hensigten". Grundin var, at ov lítið forbrúk og framleiðsla var í Føroyum, har bara 1853 menn yvir 15 ár búðu. Fríhandil kundi økja framleiðsluna, „men uden Tvivl langsomt og usikkert." Nevndin óttaðist fyri, at handilin eftir stuttari tíð „vilde falde i en eller anden

driftig Mands Hænder, og saaledes blive ligesaa monopolistisk og mere trykkende, end nu."

Tilmælið var tí at lata handilin halda fram og royna at forða fyri, at hann framhaldandi gav undirskot, „men Ideen om Handelens Frigivelse bør ingenlunde opgives, Frigivelsen bør derimod passende forberedes." Fyrsta stig í so máta var at stovna nýggjar handilsstøðir, sum kundu latast handilsmonnum, tá ið fríhandilin kom. Fyrsta handilsstøðin átti at vera í Suðuroy, sum lá longst frá handlinum. Hetta var longu skotið upp í 1790, men var ongantíð framt, tí ein slík støð varð sett í samband við kolavinnuna, sum tó síðani var hildin uppat. Løbner hevði munnliga greitt frá, at suðuroyingar vóru áhugaðir í at gjalda fyri eina slíka handilsstøð, um teir fingu loyvi til at handla beinleiðis við Danmark, og hann fekk tí boð um at taka upp samráðingar um tað. Eydnaðist tað ikki, kundi handilsstjórnin koma við uppskoti um, hvussu tað kundi gerast til veruleika. Líkandi handilsstøðir norðanfyri kundu útsetast.

Hinvegin helt nevndin ikki so nógv um uppskot amtmansins um at seta á stovn lím- og sápukókarí, tí tað var alt ov óítøkiligt, og nevndin tordi heldur ikki at taka undir við uppskotinum um, at føroyingar sjálvir sluppu at flyta út lýsi og fisk, tí so fór núverandi handil ikki at yvirliva, og tað sama var støðan viðvíkjandi speculatiónsskipi.

Síðsta uppskotið hjá nevndini var at broyta reglurnar fyri takstirnar. Teir skuldu setast einaferð um árið, „da Indebyggerne derved vænnes til de afvexlende Priser, som en Frihandel medfører." Nevndin vísti á, at sum støðan var, vórðu farmur og aðrar útreiðslur lagdar oman á útflutningsvørurnar, og tí var søluprísurin í Føroyum av innfluttum vørum ov lágur, samstundis sum føroyingar fingu ov lítið fyri sínar vørur. Hetta eggjaði til ónøgd og loynihandil, og tí mælti nevndin til at broyta hesa reglu, so hon líktist meira privatum handli. Løtan var tann rætta til at gera hesa broyting, tí byggprísurin var lágur[43].

Partar av tilmælinum hjá nevndini vóru kunngjørdir í yvirlýsing frá 21. september 1821, har avgjørt varð, at Einahandilin skuldi halda fram, men broytingar skuldu gerast í príspolitikkinum (Nolsøe og Jespersen 2009: 235). Í 1823 varð 1/3 lagdur oman á innkeypsprísin á øllum vørum uttan neyðsynjarvørum, timbur og nævur. Samstundis hækkaði Einahandilin prísin á útflutningsvørum til 2/3 av miðalprísinum á marknaðinum árið fyri (Nolsøe og Jespersen 2009: 239). Hetta samsvaraði við tilmælið hjá nevndini, tí frammanundan var einki gjald lagt oman á prísin á innflutningsvørum, samstundis sum prísurin á útflutningsvørum bara var ½ av miðalprísinum árið fyri.

Í Danmark batnaði búskapurin, sum 1820-árini liðu, og í 1827 merktist nýggja prísskipanin av álvara í Føroyum, tí prísurin á korni tvífaldaðist. Tað

43 SA. Rentukamarið. Diverse breve og dokumenter vedr. Færøerne og den færøske handel (1682-1847). Alt hetta um álitið frá nevndini at viðgera spurningin um føroyska handilin er í „Extact af Commissions-Forestillingen af 14de Julii 1821, angaaende den færøske Handels bedre Indretning m.v."

gjørdi, at torført var hjá fólki at fáa mest neyðturviliga matin á borðið. Á heysti sendi Tillisch amtmaður Rentukamarinum eina áheitan um at gera okkurt við tann ógvuliga ringa standin, sum var í Føroyum orsakað av høga kornprísinum, og Rentukamarið skipaði fyri, at treingjandi húski fingu eina peningagávu, tá ið kongur fylti í januar 1828 (Nolsøe og Jespersen 2009: 241).

Nógv meir enn tað kundu myndugleikarnir neyvan gera, um teir vildu halda fast í endamálinum við at lata prísin í Einahandlinum fylgja marknaðarprísinum. Føroyingar kendu nú á sín egna kropp, at skiftandi prísir merktu skiftandi liviumstøður. Einahandilin var ikki longur tann tryggi og óbroytiligi skansin, sum hann hevði verið, og við tíðini gjørdist júst hetta við skiftandi prísum ein av høvuðsorsøkunum til, at undirtøkan fyri fríhandli vaks. Samstundis virkaði høgi kornprísurin eisini sum kreativ destruktión, tí tá ið prísurin fór upp, eggjaði tað fólki til heldur at velta meira sjálvi, og umframt vøkstur í kornveltingini hevði høgi kornprísurin ávirkan á, at rættilig gongd kom á eplaveltingina í Føroyum (Isholm 2014: 58).

Eftir at nevndin í 1821 var liðug við arbeiði sítt, gingu 13 ár, til spurningurin um fríhandil í Føroyum aftur varð tikin til viðgerðar. Sum greitt er frá í undanfarna kapitli, hendu fleiri grundleggjandi umsitingarligar broytingar hetta sama árið, m.a. at Føroyar fingu sín egna amtmann, og at greiðari reglur komu fyri, hvussu lógir skuldu setast í gildi í Føroyum. Í 1825 gjørdist tann fyrsti av einari røð av ungum og væl útbúgvnum løgfrøðingum amtmaður, og stutt eftir tóku frælslyntar politiskar rørslur seg fram í Evropa, og kongur avgjørdi tí í 1831 at kalla stættating saman.

Nógv orðaskifti var um handilsfrælsi og fólkaræði, og hesi rák gjørdu sítt til, at ein nevnd veturin 1834 varð sett at gera uppskot um ábøtur á handilin í Føroyum og fyrireika landið til fríhandil. Í nevndini vóru handilsstjórnin og amtmaðurin F.F. Tillisch (Nolsøe og Jespersen 2009: 288). Tillisch hevði tá stutt frammanundan verið noyddur til at taka støðu til, hvat gerast skuldi við fremmandu fiskiskipini, sum komu nærri og nærri landi at fiska og harvið trokaðu føroysku útróðrarmenninar burtur av kendum leiðum. Støðutakan Tillischar gjørdist byrjanin til eina nýggja føroyska fiskivinnu, og hon ávirkaði eisini viðgerðina av spurninginum um Einahandilin. Tað er ta søguna, vit skulu lýsa gjølligari í III. parti.

## *4.15 Samanumtøka*

Í hesum kapitlinum hevur verið víst á, at tað í stóran mun var merkantilistiski politikkurin hjá Kristiani 4., sum skapti eina javnvágsfellu í Føroyum. Kongur vildi tryggja sær, at ríkið var so sjálvforsýnandi, sum til bar, samstundis sum útflutningurin skuldi mennast. Allur handil skuldi tí vera á donskum hondum, og samband millum føroyingar og útheimin skuldi avmarkast so nógv, sum

til bar. Bundnar hosur var góð útflutningsvøra, men hosubindingin gav eisini føroyingum møguleikan at umseta arbeiðsorku til pening, og tað gjørdi støðuga bóndasamfelagið uppaftur støðugari. Á tann hátt var hosuframleiðslan við til at styrkja um javnvágsfelluna, tí hon var til fyrimuns fyri bæði veika statin og bóndastættina.

Hvussu sterk javnvágsfellan var, kom til sjóndar, tá ið handilin síðst í 17. øld royndi at sleppa undan hosuútflutninginum, tí hann gav handlinum stórt undirskot. Føroysku bøndurnir mótmæltu, tí teir vildu ikki missa henda møguleikan at vinna pening upp á arbeiðsmegina, og tá ið kongsvaldið skuldi taka støðu, varð nógv størri atliti tikið til føroyingar enn til handilin, sum tí kom at verða rikin við undirskoti í mong ár. Undirskotið gjørdi, at kongur ikki slapp av aftur við handilin tíðliga í 18. øld, og tí kom hann sjálvur at standa fyri handlinum heilt frá 1709 til 1856. Umleið 1725 høvdu ymiskir konjunkturar við sær, at handilin aftur fór at geva yvirskot, og tí varð handilin ein fyrimunur fyri bæði umsiting, íbúgvar og handil stóran part av 18. øld, sum var merkt av búskaparligari framgongd.

Framgongdin var bygd uppá, at alsamt størri og størri partur av ullini fór til at framleiða hosur, men at enda var øll ullin brúkt í framleiðsluni, og tí kundi framgongdin ikki longur byggja upp á at økja um rávøruna. Komið var til eitt kritiskt vegamót, har avgerð skuldi takast um, hvør rætti vegurin nú var at ganga. Ein møguleiki var at fara burtur frá ekstraktiva bóndasamfelagnum og menna nýggjar vinnumøguleikar, hin var at varðveita gomlu samfelagsskipanina og býta avmarkaða tilfeingið eftir henni. Við lógini frá 1777 varð seinni møguleikin valdur, og tað gjørdi, at moderniseringin av vinnuni varð útsett í mong ár.

Um somu tíð var handilin aftur farin at geva undirskot, serliga tí at innkeypsprísurin á korni vaks, uttan at handilin kundi koyra meirútreiðsluna yvir á kundarnar. Undirskotið í handlinum skapti enn eitt kritiskt vegamót, og tað endaði við, at ein nýggj reglugerð varð gjørd um føroyska handilin í 1790. Tá var eisini ætlanin at avtaka Einahandilin, men trýst úr Føroyum og seinni eisini óhepnir konjunkturar gjørdu, at tað varð útsett, og síðani forðaðu kríggj og statsbankarot fyri broytingum. Tá ið neyðugt var at lata eitt sindur upp fyri fremmandum handli undir krígnum, sást, hvussu stóra ávirkan fríur handilin kundi fáa á bæði hugburð og t.d. nýggjar avgrøðir, men veiki staturin var skjótur at steðga hesari ávirkanini, so skjótt sum hann megnaði tað.

Í 1821 skuldi avgerð aftur takast um handilin, tí liberala rákið hevði rinið so mikið væl við í Danmark, at tað vóru tey, sum hildu Einahandilin vera eina anakronismu, sum ikki hoyrdi tíðini til. Úr Føroyum vóru greiðu boðini, at eingin áhugi var fyri at avtaka Einahandlin, og niðurstøðan hjá nevndini, sum fekst við málið, var, at føroyski marknaðurin var so lítil, at vandi var fyri, at almenna monopolið fór at gerast eitt privat monopol. Harumframt hevði føroyska fólkið verið avskorið frá øllum handilsvirksemi í so langa tíð, at brúk var fyri at fyrireika bæði land og fólk til eina so stóra avgerð. Nevndin hevði nøkur hugskot til,

hvussu til bar at fyrireika føroyingar til at taka ímóti fríhandli, og serliga var tað príspolitisku átøkini, sum fá ár seinni komu at virka sum ein kreativ niðurbróting av gomlu samfelagsskipanini.

Draga vit saman um, ber til at siga, at búskaparliga skipanin við hosum sum høvuðsútflutningsvøru, sum hevði sín uppruna í merkantilistiska politikkinum tíðliga í 17. øld, fleiri ferðir næstu 200 árini kom at standa við eitt vegamót, har møguleiki var fyri at velja eina aðra leið við kreativari niðurbróting av skipanini, so pláss gjørdist fyri nýggjum møguleikum. Hetta valið varð kortini ongantíð tikið, tí veika statsvaldið í Føroyum og bøndurnir høvdu fyrimun av galdandi skipan, og tí var eingin vilji til at gera nakrar broytingar. Úrslitið varð, at ekstraktiva skipanin slapp at halda fram, sjálvt um hon við tíðini gjørdist uppaftur meira ekstraktiv orsakað av avmarkaða tilfeinginum.

Í øllum teimum førunum, har ynski hesi 200 árini vóru frammi um at fremja broytingar í skipanini, var víst á fiskivinnu sum ein upplagdan møguleika at royna aðrar vinnugreinir. Gabel gramdi seg longu í 1688 um, at føroyingar vóru hildnir uppat at fiska, og bæði í 1790 og 1821 komu nevndirnar, sum viðgjørdu føroyska handilin, til, at fiskivinna við størri førum átti at stuðlast, tí hetta var ein upplagdur møguleiki at menna føroyska búskapin. Trupulleikin var bara, at eitt veikt embætisverk og eitt konservativt bóndasamfelag vóru ein forðan fyri at hesi góðu hugskotini kundu fremjast í verki.

# 5. kapittul
# Fiskivinnuroyndir áðrenn 1830

Fleiri kristisk vegamót vóru í menningini av føroyska samfelagnum tey gott og væl 200 árini frá umleið 1600 til 1830, sum greitt er frá í undanfarna kapitli. Tá ið støða skuldi takast við hesi kritisku vegamótini um, hvør rætta leiðin var at fara, endaði tað hvørja ferð við, at myndugleikarnir valdu at halda fast við ekstraktivu samfelagsskipanina heldur enn at velja eina leið fram ímóti einum meira liberalum og inklusivum samfelag. Orsøkin var, at hvørki veika statsvaldið ella sterka bóndasamfelagið høvdu nakran áhuga í at gera nakrar broytingar, og tí var samfelagið fangað í einari javnvágsfellu. Við kritisku vegamótini var tað greitt hjá teimum, sum skuldu taka støðu, at fríhandil og fiskivinna vóru vegurin burtur úr javnvágsfelluni og ekstraktiva samfelagum, men tað var ikki so lætt at fremja hesa broyting, og tí var hvørki fríhandil ella fiskivinna í Føroyum í 1830. Í hesum kapitlinum verður hugt at ymisku hugsanunum um at menna eina fiskivinnu og fleiri av teimum fiskivinnuroyndunum, sum vórðu gjørdar hesar báðar øldirnar. Roynt verður at finna fram til, hví ongar av hesum royndum og hugsanum gjørdust til veruleika.

## 5.1 Fiskaútflutningurin minkar

Í seinmiðøld fall prísurin á korni orsakað av demografisku kreppuni, sum m.a. svarti deyði var orsøk til. Samstundis øktist prísurin á kjøti og fiski, og tað hevði við sær, at eftirspurningurin eftir turrum og saltaðum fiski, sum kundi flytast langan veg og goymast eina tíð, vaks á evropeiska marknaðinum. Hesin eftirspurningur hevði við sær, at turrur fiskur gjørdist týdningarmiklasta útflutningsvøran í Norðuratlantshavi, og tey tveyhundrað árini frá umleið 1350 til 1550 vórðu londini drigin meir og meir inn í framvaksandi kapitalistiska búskapin í Evropa. Hetta var fyrsta dømi um, at „den fremvoksende kapitalistiske økonomi i den nordatlantiske periferi efterspørger et enkelt produkt og derved tvinger området i en énsidig, markedsafhængig produktion.“ (Stoklund 1991: 57). Á henda hátt komu Føroyar og onnur norðuratlantisk lond ógvuliga tíðliga at standa niðast í hierarkinum í vaksandi kapitalistiska heimsbúskapinum (Johansen 1997: 62).

Hollendarar, bretar og hansakeypmenn bygdu allir flotar at fiska í Norðuratlantshavi, men teir keyptu eisini fisk, og tí gjørdist fiskur høvuðsútflutningsvøra í Føroyum, samstundis sum fiskakeypararnir eisini komu at taka sær av handlinum sum heild. Keldurnar, sum umrøða Føroyar, eru sera fáar frá hesi tíðini, og tí vita við mestsum einki um, hvussu føroyski parturin av hesi

fiskivinnuni varð rikin, annað enn at fiskur var týdningarmikil útflutningsvøra, og tá ið vit fáa eitt sindur betri keldugrundarlag umleið ár 1600, var tíðin við nógvum fiskaútflutningi um at enda.

Um aldaskiftið 1600 vóru tað serliga onglendingar og skotar, sum fiskaðu undir Føroyum, og ein orsøk var helst, at hollendingar fiskaðu so nógv fram við skotsku strendurnar, at teir troðkaðu skotar longur til havs at fiska. Nógv samskifti var millum skotska og seinni bretska kongin Jákup 1. og danska kongin Kristian 4. um hesa fiskiveiðu, og í 1617 klagaðu føroyingar fyri kongi um, at ein stórur floti av skotskum skipum síðstu árini hevði verið í Føroyum, og „med deres små skibe sejler og ror igennem landet og ind udi alle fjorde og havne, fisker og opriver indenfjords og udenfor den fattige næring, som vi fattige follk med vore små både på sådanne steder søge kunne såvel som på alle vore fiskeklakke og grunde." Seinni í skrivinum stendur, at um hetta heldur fram, so „kommer (vi) udi alsomstørste elendighed, så at vi ikke kunne købe noget til vores husbehov eller og bliver mægtige at udgive vores leje og landsskyld." Einasti fyrimunurin hjá skotum, sum føroyingar nevndu, var, at teir høvdu sild, og tað høvdu føroyingar ikki sjálvir. Fiskurin fór eftir húkunum við sild á, og tí komu teir at sita tómhentir, sum onga sild høvdu at lokka við (Zachariassen 1961: 133).

Í bók síni *Føroyar sum rættarsamfelag* hevur Louis Zachariassen greitt frá gongdini í hesum samskiftinum millum Bretland og Danmark, og endin varð, at bretski kongurin 27. mars 1618 ásannaði, at bretar skuldu halda seg burtur frá fiskiskapi í Føroyum (Zachariassen 1961: 129–142). Neyvan hevur ein slík avtala gjørt, at bretska fiskaríið í Føroyum helt heilt uppat, men í løgtingsbókunum er týðiligt, at teir ikki vóru so vanligir gestir í Føroyum, sum teir høvdu verið frammanundan (Zachariassen 1961: 141).

Samráðingarnar millum bretar og danir um fiskirættindi eru eitt gott dømi um, at tjóðarstatirnir gjørdust betri skipaðir í 17. øld, og ein týdningarmikil partur av hesi gongd var tann merkantilistiski handilspolitikkurin, sum londini fóru undir at føra hesa tíðina. Í undanfarna kapitli varð grundgivið fyri, at hesin sami merkantilistiski politikkurin hjá Kristiani 4. helst var høvuðsorsøkin til, at hosur gjørdust høvuðsútflutningsvøra Føroya heldur enn fiskur. Undir øllum umstøðum ber til at staðfesta, at ull og ullvørur tíðliga í 17. øld gjørdust høvuðsútflutningsvøra Føroya.

Í *Havnar søgu I* halda Jens Pauli Nolsøe og Kári Jespersen, at „myndugleikarnir heilt frá gablatíðini meir at kalla (høvdu) forðað føroyingum at fiska". Teir vísa á, at fiskaprísurin í 1566 var 20 skinn fyri eina vág av fiski, og at hann í hundraðáratakstinum frá 1691 var 20 % lægri (Nolsøe og Jespersen 2004a: 212). Hóast tølini ganga upp, so gevur hetta sjónarmið lítla meining, tá ið hugsað verður um tær viðmerkingarnar, sum Gabel hevði til klagurnar í 1690, sum greitt er frá í undanfarna kapitli.

Tá vildi Gabel fegin hava føroyingar at fiska, so at sleppast kundi undan alt ov nógvum undirskotsgevandi hosum, og hann gramdi seg um, at føroyingar



*Kristian IV samskifti dúgliga við svág sín enska og skotska kongin James I um bretsku fiskiskipini, sum royndu undir Føroyum. (Mynd: wikicommons)*

gjørdu ov lítið við fiskin og bara løgdu seg eftir at fiska, tá ið hann var lættur at fáa fatur á. Keypmaður hansara var uppaftur greiðari í sínari ørkymlan av, at føroyingar í so stóran mun høvdu lagt seg eftir „kvindagtige Gjerninger og Arbejd" og samstundis slept fiskivinnuni.

Harumframt var tað eisini Fríðrikur Gabel, sum gjørdi ta fyrstu royndina, vit vita danskan ríkisborgara hava gjørt at fiska við skipi undir Føroyum. Tað var verjuskipið „Justitia", sum í 1688 fekk boð um at gera fiskiroyndir, tá ið umstøðurnar loyvdu tí (Andersen 1964: 134). Fiskiroyndirnar eydnaðust illa av ymiskum orsøkum (Nolsøe og Jespersen 2004a: 210), men bara tað, at royndirnar vórðu gjørdar, vísir, at áhugi heldur var fyri at seta gongd í fiskivinnu enn at forða henni. Seinni í 18. øld vórðu aðrar royndir gjørdar at fáa gongd á fiskivinnu, og tilsamans eru tær eitt prógv um, at tað upprunaliga ikki vóru myndugleikarnir, sum forðaðu føroyingum at fiska, men heldur trygga hosuframleiðslan, sum hóskaði betur til bóndasamfelagið, enn ein fiskivinna við stórum konjunkturum.

Í hundraðáratakstinum var prísurin fyri eina vág av turrum fiski 16 skinn, og 3 gyllin fingust fyri eina tunnu av saltaðum toski. Einasti variabli prísurin í takstinum var á feskum fiski. Um hann stóð, at „Blød Fisk selgis som Kiøbmanden og Indbyggerne best kand foreenis om" (*Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af*

*den færøske Landbokommission, nedsat i Henhold til Lov af 13/3 1908* 1911: 52). Tað bendir á, at handilin sjálvur tók ímóti fiski, sum hann kundi virka til annaðhvørt turran ella saltaðan fisk, ella at hann í øllum førum hevði ætlanir um at gera tað. Fyri handilin var tað ein trupulleiki, at fiskurin svann, og vektin harvið gjørdist minni, tá ið fiskurin varð seldur á marknaðinum, enn tá ið hann varð keyptur. Tí ásetti reglugerðin frá 1691 eisini, at krevjast skuldi ein yvirvekt á trý pund fyri hvørja vág av fiski. Tað gjørdi sjálvandi, at íbúgvar fingu minni fyri fiskin, men samstundis fekk keypmaðurin í sín lumma ta yvirvektina, sum ikki varð svunnin. Sostatt kundi keypmaðurin persónliga fáa vinning upp á fiskasølu, og tí er lítið sannlíkt, at hann ikki skuldi havt áhuga í at økja um hesa sølu.

Áhugin fyri at menna eina fiskivinnu sást beinanvegin aftur, tá ið kongur yvirtók handilin í 1709. Stutt eftir, at Jørgen Christian Klein tók við sum keypmaður og fúti í Føroyum, setti hann seg í samband við Peter Bondesen fyri at fáa hann at koma til Føroya at virka við handilin. Bondesen hevði royndir úr Íslandi, og hann dugdi tí bæði at salta kjøt og fisk og at virka fiskin til klippfisk. Kanska hevði Bondesen eina hóming av, at hansara vitan kundi fáa stóran týdning fyri Føroyar, tí hann kravdi stóra løn afturfyri. So stórt var lønarkravið, at Rentukamarið aftraði seg við at taka av, og áðrenn teir komu so langt, sakk skip Bondesens í Hetlandi á heysti 1710. Peter Bondesen læt sjálvur lív í vanlukkuni (West 1985: 50), og tí hendi ikki meira við hesum ætlanunum um at fara undir at virka salt- og klippfisk í Føroyum.

Tann fiskurin, sum varð útfluttur, var tí framvegis fiskur, sum bøndur turkaðu heima hjá sær sjálvum. Soleiðis var fiskavirkingin bara eitt síðuarbeiði afturat vanliga bóndaarbeiðinum, og vantandi professionaliseringin av fiskaframleiðsluni sást aftur í prísunum. Í 1722 sendi Rentukamarið Løgtinginum boð um, at fiskurin var ov vánaligur, og tað gjørdi, at hann varð seldur fyri helvtina av prísinum á tí íslendska. Hetta var eitt sindur yvirdrivið, men prísurin á føroyskum fiski sær ikki út til at hava verið so góður sum á tí íslendska. Tann íslendski fiskurin var ein týdningarmikil vøra, og í 1729 varð forboð sett móti innflutningi av fremmandum turrum fiski fyri at verja íslendsku keypmenninar. Samstundis sæst einki til, at nakar áhugi var fyri at menna fiskivinnu í Føroyum, og føroyski handilin tók eingi serlig stig til at menna fiskivinnuna í árunum 1709-1776 (Nielsen 1976: 49).

Hyggja vit at tølunum fyri virðið á samlaða útflutninginum av turrum fiski úr Føroyum árini 1709 til 1790, sæst, at tað tey flestu árini var sera lítil útflutningur av fiski, men so kunnu nøkur ár koma, har væl meir enn vanligt varð avreitt og útflutt. Tað bendir á broytingar í fiskaríkidøminum, heldur enn á broytingar í arbeiðsorkuni, sum varð løgd í fiskaríið (Nielsen 1976: 18), og tað samsvarar væl við tað, sum Fríðrikur Gabel segði í 1690 um, at føroyingar bara fiskaðu, tá ið „vor Herre sender saa mangfoldig Fisk, saa at sige ind paa Næsen paa dem, at de mere Lyst end Umage derved kan have." Hann helt, at føroyingar roknaðu

Talva 5.1




*Kelda: (Degn 1929: 134–137)*

hosurnar sum vissan vinning, meðan fiskurin var óvissur vinningur, sum bara varð gagnnýttur, tá ið hann var lætt atkomiligur (Andersen 1964: 145). Tølini geva eisini eina greiða ábending á, at fiskaútflutningurin avmarkaði seg til tað, sum leyp av, tá tørvurin á mati til húsarhaldini var nøktaður. Tí er fiskaútflutningurin eisini treytaður av, hvussu væl tað hepnaðist at fáa aðrar matvørur til høldar tey einstøku árini. Nógv grind minkaði um tørvin á at eta fisk, og tí kundu góð grindaár gera, at nógvur fiskur varð útfluttur.

Fyrstu árini var fiskaprísurin í handlinum 16 skinn, meðan hann í Leigubúðini var 20 skinn fyri vágna, men í 1723 vórðu hesir prísir javnaðir út, so at 18 skinn fingust fyri vágna í báðum støðum. Tá fór handilin at taka ímóti meira fiski, enn Leigubúðin fekk, men tað sær ikki út til, at nakað gott fiskiár var millum 1715 og 1746, og tað samsvarar eisini við tíggjundaroknskapin. Í 27 av hesum árunum var als eingin fiskaútflutningur, og bara tað allarbesta árið fór virðið á fiskinum upp um 10 % av samlaða útflutninginum (Nielsen 1976: 39).

## *5.2 Løgmaður vil menna fiskivinnu*

Í undanfarna kapitli varð eitt sindur gjørt burturúr at greiða frá nýggju búskaparligu hugsanunum hjá Hans Jacobsen Debes løgmanni og tí svarinum, hann fekk frá Lund handilsforvaltara, men ósemjan teirra millum fevndi eisini um eina møguliga øking av fiskaútflutninginum.

Hans Jacobsen Debes løgmaður vísti í bók síni frá 1769 á, at prísurin fyri eina tunnu av saltaðum toski, sum varð ásettur í 1691, var ov lítil, tí eingin fekst at lata handlinum hesa vøruna fyri 3 gyllin tunnuna. Hevði prísurin verið 4 ella 5 gyllin, hevði meira verið avreitt, tí fiskur kundi ikki turkast alt árið í føroyska veðurlagnum. Tað einasta, sum umráddi, var tí at læra føroyingar at salta fiskin niður í tunnur (Debes 1769: 40).

Áhugavert er eisini at síggja, at hann mælti frá, at handilin átók sær at virka fiskin, tí tað hevði fyrr í tíðini víst seg at vera „kun Daarlighed“ (Debes 1769: 40). Hetta er eitt greitt prógv um, at handilin áður hevði roynt at virka fisk, men tær royndirnar hava helst ikki verið væleydnaðar, ella hevur handilin í øllum førum fingið skyldina fyri, at royndirnar miseydnaðust.

Debes løgmaður skilti ikki, at tað skuldi vera so torført at fáa reiðan pening fyri vørurnar, sum handilin tók ímóti, tí føroyingar guldu ein gyllin ella 5 markar fyri hvørja danska krónu, og tað merkti, at handilin vann 12 skillingar upp á hvørja krónu, umframt vinningin á sjálvari vøruni. Hann helt harumframt, at tað kundi eggjað til størri framleiðslu, um føroyingar fingu reiðan pening í hondina fyri fisk, og fyri handilin átti tað ikki at vera nakar trupulleiki, tí hann kundi altíð selja fiskin við vinningi (Debes 1769: 39).

Lund handilsforvaltari var samdur við Debes í, at prísurin á saltfiski var ov lágur, og hann helt ikki, at ein tunna kundi seljast fyri minni enn 5 gyllin. Hann var eisini væl kunnaður um fiskavirking í Íslandi og vísti á, at í Íslandi tóku keypmenninir ímóti fiskinum og saltaðu hann síðani í stórar stampar ella kør við fronskum salti. Har varð fiskurin liggjandi í 3 dagar og nætur, áðrenn hann varð tikin upp og vaskaður í saltvatni. Tá ið vatnið var runnið av honum, varð fiskurin síðani lagdur í eikitunnur. 50 góðir sildafiskar kundu fara í hvørja tunnuna. Um teir ikki vóru alt ov rak, vigaðu teir turkaðir 96 skálpund, sum er áleið 50 kilo.

Á útreiðslusíðuni rakk ein tunna av sponskum salti til fýra tunnur av toski, og í fyrstu salting skuldi ein tunna av fronskum salti brúkast til 250 toskar ella fimm tunnur. Ein fjórðings tunna av sponskum salti kostaði 1 gyllin, og ein fimtings tunna av fronskum salti kostaði 10 skinn. Tunnan sjálv kostaði 14 skinn, so samanlagt var kostnaðurin 2 gyllin og 4 skinn. Handilin læt 2 gyllin og 8 skinn fyri turra fiskin nevndur rotskær, so øll orkan, sum skuldi leggjast í at salta fiskin í tunnur heldur enn at turka hann, gav bara 8 skinn, um prísurin var 5 gyllin (Lund 1770: 34). Tí skuldi lítið til, at tað gekk galið, um fólk sjálvi

stóðu fyri saltingini. Lund ivaðist tí ikki í, at tað rætta var, at handilin stóð fyri saltingini, eins og keypmenn gjørdu í Íslandi (Lund 1770: 36).

Men tað var týðiligt, at Lund var einki fyri, at handilin skuldi leggja seg eftir at taka ímóti fiski til saltingar. Hann vísti á, at allur turri fiskurin, sum gjørdist handilsvøra, varð fiskaður frá miðjum mars til síðst í apríl, og tí var tað bara summarfiskurin, sum Debes vildi hava saltaðan, og orsøkin var, at tað ikki bar til at turka hann um summarið. Men tey 22 árini, Lund hevði verið í landinum, høvdu bara tvey ár verið við góðum toskafiskiskapi, tí um summarið var lítið til av toski, og tað var mest kalvi og seiður, sum varð fiskaður (Lund 1770: 36–37). Almúgufólk ótu vanliga fisk einaferð um dagin, og tá ið meir fiskur fekst, enn tey megnaðu at eta, so viðgjørdu tey fiskin á helluni við vindi og sól. Einar tvær ferðir varð hann vaskaður í sjógvi, og tá ið rá ella fuktig luft kom, varð hann lagdur í pressu, bretti løgd omaná, og steinar omaná aftur brettunum. Tá ið veðrið so aftur varð til vildar, varð hann breiddur útaftur, til hann „naaer sin Fuldkommenhed". Summarfiskur var ofta rak, og tí varð hann ikki bjóðaður fram sum handilsvøra. Føroyingar nevndu slíkan fisk landfisk, tí hann helt seg undir landi og á firðum og víkum og ikki á teimum røttu miðunum. Hann smakkaði nakað sum íslendski klippfiskurin (Lund 1770: 37).

Lund visti ikki, um summarfiskurin egnaði seg til saltingar, men hann vísti á, at ein annar vansi var, at avskipingin av fiski, fiskaður um summarið, mátti vera við teimum síðstu skipunum, sum fóru úr Føroyum mitt í oktober ella seinni. Tá kundi tað henda, at skipini noyddust at liggja veturin yvir í Noregi ella aðrastaðni, og „hvor vilde det ikke da see suurt ud for vores Begyndere." Skuldi undirtøka verið fyri at roynt henda vinnuveg kortini, „burde en Person der forstoed Saltningen ligge ved Fiske-Pladsen og kiøbe den blød af Indbyggerne, thi ellers seer jeg ingen Fordeel herved."

Sjálvt um hann hevði hesa greiðu fatanina av, hvussu handilin kundi skipa saltfiskaarbeiðið, so helt hann kortini, at tað var óneyðugt at hugsa so langt, tí at „det Alviise Forsyn" hevði gjørt tað so, at Føroyar ikki vóru eitt stað, sum var upplagt til nakað varandi og gott fiskarií. Hvussu tað hekk saman, kundu fysiskar avhandlingar greiða nærri frá (Lund 1770: 38).

Ovasti maðurin í handlinum trúði lítið upp á fiskivinnu sum útflutningsvinnu, men hann ásannaði, at fiskurin hevði stóran týdning sum føði hjá føroyingum, og tað sást aftur í handlinum við, at ein stórur partur av almúguni noyddist at eta bygg tríggjar ferðir um dagin, tá ið fiskiskapurin var lítil (Lund 1770: 43). Lund segði seg minnast 1756 sum eitt hart ár, har „landet blev vældig medtaget", og bara góður fiskiskapur forðaði fyri hungursneyðini. Sum heild høvdu ring seyðaár ofta verið bjargað av, at nógvur hvalur og nógvur fiskur hevði verið at fingið (Lund 1770: 14), men nøkur ár undan 1770 hevði staðið illa til við toski og seiði, og hvalurin hevði verið heilt burtur í 16 ár (Lund 1770: 15).

Soleiðis hugsaði Lund um fiskin meira sum eina trygd hjá føroyingum, tá ið aðrar føðikeldur sviku, og sum ein faktorur, sum ávirkaði innflutningssíðuna hjá handlinum heldur enn útflutningssíðuna.

## *5.3 Kapitalistar royna fiskivinnuna í 18. øld*

Sjálvt um Lund ikki helt, at havið kring Føroyar egnaði seg til fiskivinnu, so fóru kapitalisk áhugamál at gera vart við seg um júst somu tíð. Tann fyrsti, sum royndi at fiska undir Føroyum við deksfari í 18. øld, var Niels Ryberg, sum byrjaði sín umskipingarhandil í Vágsbotni í 1767. Ryberg hevði frammanundan royndir av toskafiskiskapi undir Íslandi, og 30. juni 1772 fekk hann loyvi til at royna slíkan fiskiskap undir Føroyum. Tá hann fekk loyvið, hevði hann longu bygt skipið „Færøe" í Keypmannahavn. Tað kom á Havnina 27. mai og fór sín fyrsta túr 10. juni (Degn 1929: 30). Í loyvinum stóð, at hann hevði rætt til at fiska sild og tosk og at salta og virka fiskin og senda hann til Spania, Miðjarðarhav, Eystrasalt ella aðrastaðni, sum hann helt vera frægast. Fiskurin, sum „Færøe" fiskaði, varð sendur av landinum við kongliga handilsskipinum „Jubelfesten". 10. september 1773 fóru 1458 kilo av klippfiski, tvær hálvar tunnur av søltum fiski og ein foustaga av sild við skipinum (Degn 1929: 22).

Bæði í 1774 og 1775 fóru smærri nøgdir niður við handilsskipunum, men møguleiki er eisini fyri, at væl av fiski kann vera útfluttur við teimum nógvu skipunum, sum komu til Havnar í ørindum í umskipingarhandlinum hjá Ryberg. Tí er torført at siga, hvussu fiskiroyndirnar eydnaðust. Staðfestast kann tó, at hann ikki helt leingi áfram við teimum, men hesar royndirnar at virka klippfisk gjørdu, at einstakir havnarmenn eisini fingu hug at royna seg. Talan varð kortini ongantíð um stórar nøgdir, og fiskurin varð bara brúktur til egna nýtslu ella til at senda vinum og familju í Danmark (Degn 1929: 22).

Royndirnar hjá Ryberg kveiktu áhugan hjá nøkrum, men hjá øðrum var tað bara misnøgdin, sum kvaklaðist. Í 1776 noyddist Ryberg tí at klaga um, at íbúgvar royndu at leggja sínum fólki fótonglar í vegin. Hann bað Generaltollkamarið geva myndugleikunum í Føroyum boð um „at tilholde Indvaanerne ikke at gøre mine der holdende Folk nogen Hinder, naar de saaledes gjøre sig Umage for at fiske enten Sild eller Cabliau etc." (Degn 1929: 30)

Sama ár, sum Ryberg klagaði um føroyingar, royndi eitt nýtt felag seg á fyrsta sinni undir Føroyum. Tað var eitt handilsfelag í Altona, sum hevði stóran rakstarkapital og var væl stuðlað av statinum. Í 1776 sendi felagið 32 skip at fiska. Av teimum skuldu 6 skip royna toska- og sildafiskarí undir Føroyum, 3 skip skuldu fiska tosk undir Íslandi, og restin skuldi fiska sild undir Hetlandi. Fyrsta skipið kom til Føroya 19. apríl og fekk upp á ein tíma 1½ tunnu av stórum toski eystanfyri Nólsoynna, men tá ið skipið rak av miðinum, eydnaðist ikki at finna tað aftur, og endin varð, at skipið gavst. Tvey onnur skip komu 21.



*Niels Ryberg royndi við skipi sínum „Færøe" at fáa gongd á eina fiskivinnu. (Mynd: wikicommons)*

apríl og royndu á einum banka millum Mykines og Suðuroynna, men illveður gjørdi, at teir bara fiskaðu í tríggjar dagar tríggjar tær fyrstu vikurnar. Skipini fingu hesar dagar ½ tunnu í part av toski. Veiðan hjá hinum trimum skipunum var uppaftur lakari. Eitt skip skuldi veiða sild, men sildin var ikki komin undir land, so tann royndin miseydnaðist fullkomiliga. Fimm av skipunum fóru tí til Hetlands at fiska um mánaðarskiftið mai/juni, meðan tað síðsta helt fram við royndum sínum til ólavsøku. Hesa tíðina fekk skipið eina tunnu av toski, men síðst í juli fekk tað eisini 13 tunnur av sild á Skálafjørðinum. Samanlagt fingu øll skipini hjá felagnum 4417 tunnur av sild og 454½ tunnu av toski, men føroyski parturin av veiðuni var bara 13 tunnur av sild og fýra tunnur av toski.

Niðurstøðan av royndunum var greið. Harður streymur og vantandi lívd av landi úti á grunnunum gjørdu, at Føroyar ikki egnaðu seg so væl til toskafiskiskap. Í 1777 royndu fimm skip at fiska sild undir Føroyum, men tey fingu als einki, og tá ið tað í 1778 fréttist, at eingin sild var at síggja, avgjørdi felagið ikki at senda skipini aftur til Føroya (Degn 1929: 31). Niðurstøðan hjá felagnum í Altona kundu illa verða onnur enn tann, sum Lund kom til, nevniliga, at Føroyar ikki vóru skaptar til at fiska vinnuliga.

Sjálvt um royndirnar hjá Ryberg og felagnum í Altona vístu, at tað var torført at fáa fiskiskap at bera til undir Føroyum, so fingu nakrir havnarmenn hug at royna seg, og í 1785 gjørdu teir sluppina „Haabet" út til fiskiskap.

Hetta er fyrstu ferð í nýggjari tíð, at føroyingar fiskaðu við deksførum, men tíverri er tað lítið, vit vita um hesa royndina. Tað einasta, sum stendur í *Føroya*

*siglingarsøgu* (Nolsøe 1984: 44), er tað sama, sum Anton Degn hevur við í síni bók (Degn 1929: 32), og tað er ein samtíðarlig viðmerking frá Born kommandanti.

Born var týðiliga ávirkaður av tí kapitalistiska rákinum í tíðini, og tað var helst eisini hesin hugburður hansara, sum gjørdi, at áhugin var stórur fyri einari nýskapan, sum royndirnar við sluppini „Haabet“ vóru.

Tá ið „Haabet“ fór at fiska, óttaðust nakrir føroyskir fiskimenn fyri, at skip fóru at tøma havið fyri fisk. Hesa hugsan hevði Svabo eisini borið fram í frágreiðing síni, har hann vísti á, at íbúgvar á vesturfronsku oynni Oleron fyrr í tíðini óttaðust fyri, at havið fór at tømast fyri fiski, um stig ikki vórðu tikin at forða fyri ovurfisking. Svabo vísti eisini á, at upplýstir statsmenn ansaðu eftir at bjarga ynglinum og tóku avgerðir um minstu meskavíddir í eini roynd at tryggja, at havsins ríkidømi gjørdist eitt varandi ríkidømi (Svabo 1976: 110).

Hesa hugsan helt Born lítið um, tí fiskimenn vóru í túsundatali kring Bretland, Noreg, Danmark, Holland, Ísland og New Foundland, og eingin av teimum helt, at teir fiskaðu ov nógv, og at tað tí var neyðugt at ansa eftir. Hann undraðist stórliga á, at klók fólk kundu hugsa slíkar tankar, tí tey áttu at vita, at fiskurin í havinum ferðaðist eins og flytifuglurin, og tí ráddi um at taka hann, meðan hann var har, „thi ellers faaer man dem ikke.“[44]

Born helt, at tað var henda hugsanin hjá føroyingum saman við øvund, sum gjørdu, at føroyingar klagaðu bæði um skotsk skip og um „Haabet“, sum teirra egnu landsmenn áttu. „– Havde Interessanterne i dette Fartøy selv været Fiskermænd, saa maatte Forsøget absolut have lykket; men nu det maatte drives med Folk som var Forsøgets naturlige Fiender, saa gik det som det gik.“[45]

Born ásannaði, at stórur saknur var á einum korti við bankum, miðum og grynnum kring landið, tí slík vitan var neyðug, um ein fiskivinna skuldi mennast. Tí hevði hann givið skiparanum á „Haabet“ eitt Føroyakort í „stort Bestik“ og bað hann lodda dýpið ymsa staðni kring landið. Tíverri fekk hann kortið aftur við ongari átekning á, tá ið felagið handan „Haabet“ gavst við royndum sínum.[46]

Miseydnaða royndin við „Haabet“ fekk ikki Born at missa vónina um eina fiskivinnu undir Føroyum, tí royndin hevði víst, at sluppin eftir einum tíma, meðan hon lá við akkerinum úti á miðunum, fekk 216 toskar, sjálvt um streymurin var so harður, at snørini fóru við honum langt aftureftir. Harumframt hevði farmaskipið „Jubelfesten“ um somu tíð roynt at kasta varpið út á einum miði sunnan fyri Nólsoynna, sum æt Krabbin. Har fingu teir í hálvanannan tíma 37 frálíkar toskar við einum snøri. Born spurdi seg sjálvan: „Er dette ikke et Vink for Fiskeriet? – Viser det ikke tydelig en Muelighed som ingen til Dato har troet i Færøe?“

44 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 14. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.

45 Ibid

46 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 12. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.



*Farmaskipið „Jubelfesten" fekk ein dagin 37 toskar upp á hálvanannan tíma á miðinum Krabbin sunnan fyri Nólsoynna. (Mynd: Museum for Søfart)*

Royndirnar hjá Ryberg og serliga tær hjá felagnum úr Altona miseydnaðust og tóktust at geva Lund handilsforvaltara rætt í, at Føroyar ikki vóru so væl egnaðar til toskafiskiskap. Hjá Ryberg var mótstøðan frá føroyingum kortini eisini ein trupulleiki, og sambært Born var tað henda mótstøðan, sum gjørdi enda á fyrstu føroysku royndini at reka fiskiskap við deksfari. Henda fólksliga mótstøðan, sum kundi vísa seg í beinleiðis herverki á t.d. fiskireiðskap, er væl kend seinni í tíðini eisini, so eingin orsøk er at ivast í, at nakað er um tað, sum Ryberg og Born skrivaðu. Tílík mótstøða í fólkinum ímóti nýskapandi tiltøkum kann lættliga setast í samband við tann partin, sum bóndasamfelagið átti í javnvágsfelluni.

Samstundis er eisini áhugavert at síggja, hvussu hugsanin um framtíðina ávirkar tað, sum tú sært í nútíðini. Lund vildi halda fast við verandi handilsskipan, og tað gjørdi helst sítt til at skapa fatan hansara av, at Guð hevði syrgt fyri, at Føroyar ikki egnaðu seg til fiskivinnu. Hinvegin vildi Born fegin hyggja at nýggjum møguleikum í framtíðini, og tað ávirkaði, hvussu nógva vón hann legði í teir fáu fiskarnar, „Haabet" fiskaði, áðrenn teir góvust við royndunum. Framtíðin skuldi í ein stóran mun skapast upp á trúgv.

Svabo helt, at føroyingar áttu at velt so nógvan hamp, sum brúk var fyri til at spinna til línur. Maðurin á myndini spinnur hamp, sum hann hevur keypt í handlinum, á snældu.
(Mynd: Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782)




## 5.4 Svabo um fiskivinnu sum triðja vinnan

Jens Christian Svabo trúði, sum greitt er frá í partinum um Einahandilin, at í Føroyum skuldu vinnurnar skipast soleiðis, at jarðarbrúk skuldi vera fremsta vinna, síðani kom djórahald, og at enda kundi so fiskivinna koma sum tann triðja vinnan. Hesin yvirskipaði fysiokratiski hugburðurin sást aftur í øllum tí, sum Svabo skrivaði og annars fekst við, men kortini er okkurt at finna um fiskivinnu í stóra ritverki hansara.

Í ritinum frá 1773 helt hann, at bøndurnir ikki fullnýttu møguleikarnar, sum teir høvdu við róðrarbátunum. Hann helt eisini, at bøndurnir áttu at lært at saltað fiskin og serliga at virkað hann til klippfisk (Svabo 1937: 224). Tað skuldi m.a. gerast, so at saltur fiskur kundi gerast døgurðamatur í húsarhaldinum, og restin fara til handilsvøru. Føroyingar skuldu eisini læra nýggjar mátar at fiska uppá, og tá ið veltingin var komin rættiliga í gongd, skuldi hampur veltast, so hann rakk til tann tørvin, fiskivinnan hevði á honum (Svabo 1937: 232). Týðiligari kann tað neyvan gerast, at tað var landbúnaðurin, sum lá Svabo fremst í huga.

Svabo nevndi ikki fiskivinnuna aftur fyrr enn í einum skrivi til Christian Ludvig Stemann geheimeráð í februar 1777 nevnt „Forslag om Forbedring af Agerdyrkningen og Faareavl paa Færøerne“. Fiskivinnan var ikki partur av




*Svabo hevði í 1777 skotið upp, at landsins bátabygging varð savnað í Havn, so at serkunnleiki í hesi vinnuni kundi gagnnýtast. Stutt eftir kom gongd á eina slíka spesialisering í Nólsoy, og hon hevði uttan iva stóra ávirkan á, at tað var í hesi lítlu oynni, fleiri av fyrstu føroysku skipunum vórðu bygd. (Mynd: Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782)*

heitinum á skrivinum, og orsøkin sæst aftur í fyrsta setningi um fiskivinnuna, sum ljóðaði soleiðis: „Det færøske Fiskerie synes ikke at fortjene store Bekostninger for dets Uvisheds Skyld." Í skrivinum hevði Svabo kortini nøkur hugskot um, hvussu fiskivinnan kundi mennast.

Eitt var, at bátabygging varð savnað í Havn, tí á tann hátt gjørdist tað ein vinna, og bøndurnir fingu betri bátar, enn teir, sum teir sjálvir bygdu. Bøndur skuldu annars lærast at virka fiskin til klippfisk, at fiska við gørnum og at fiska við húki eftir hákelling. Fiskiroyndirnar hjá Ryberg hava helst eisini ávirkað Svabo, tí hann helt, at tá ið bestu firðirnir til sildafiskiskap vóru funnir, skuldu nakrar „fremmede Familier" eggjast til at seta seg niður har og læra seg at salta sildina. At enda sá hann góðar møguleikar í at fiska síl á vøtnunum. Hinvegin hevði Svabo onga tiltrúgv til fiskivinnu við størri førum, tí tað „vil neppe Lønne Umagen." Skuldi tað bera til, skuldi tað samskipast við hvalaveiðu, og eigarar av slíkum skipum skulu fáa „nogle Friheder". Fekst tað at bera til, so helt hann, at „det ikke allene skulde i Tiden blive Indbyggerne selv mueligt at fiske med Hukkerter, men endog Fordeelagtigt."[47]

47 SA. Rentukamarið. Diverse breve og dokumenter vedr. Færøerne og den færøske handel (1682-1847)Umslagið (Stemann 234) J.Chr. Svabos: Forslag om Forbedring af Agerdyrkning og Faareavl paa Færøerne, Kbh 3/2 1777.

Í Føroyalýsing síni visti Svabo at siga, at uppskotið um at gera eina vinnu burtur úr bátabyggingini, heldur enn at hvør bóndi bygdi sín egna bát, var ein veruleiki, tí flestu bátar vóru nú bygdir í Nólsoy, har fleiri bátasmiðir vóru savnaðir. Teirra bátar vóru bæði betri og bíligari, og í Nólsoy fingu teir fatur á øllum tilfarinum og høvdu jarnsmiðju, sum framleiddi bátaseym og annað. Prísurin á einum áttamannafari var millum 26 og 27 ríkisdálar (Svabo 1976: 82). Helst hevur henda spesialiseringin í Nólsoy havt stóra ávirkan á, at tað var úr júst hesi oynni, at fleiri av teimum fyrstu deksførunum komu, og tað kann eisini hava gjørt sítt til at eggjað Nólsoyar Párli at royna nýggjar leiðir. Ávirkanin sást eisini aftur, longu meðan Svabo gjørdi sínar kanningar, tí í Havn hevði hann sæð „en smuk dansk Baad ella Sluppe", sum bátabyggjara í Nólsoy høvdu bygt (Svabo 1976: 85). Henda slupp er torfør at finna í øðrum keldum, so illa ber til at siga nakað um, hvør hon var, ella hvat hon skuldi nýtast til.

Svabo tók eisini orðini hjá Lund um, at Føroyar av tí alvísa ikki vóru egnaðar til fiskivinnu, upp í Føroyalýsing síni. Hann saknaði grundgevingar frá Lund, men greiddi sjálvur frá, at seinastu tvær øldirnar høvdu víst, at fiskaríið var ikki støðugt, sjálvt um tað kundu koma tíðir, har nógvur fiskur var at fáa. Sjálvur royndi hann at grundgeva fyri hesum óstøðuga fiskaríkidøminum við at siga, at oyggjarnar góvu onga lívd fyri vindi, og tí var aldan beinanvegin stór, tá ið vindur kom. Sama søga endurtók seg í sjónum. Fiskurin var mest á djúpum havi, men „den Drift, som den milde Natur har indgivet et hvert Dyr til sin Arts Vedligeholdelse" gjørdi, at hann leitaði sær longri inn, har sólin kundi viðvirka til at menna rognini. Henda ferðing var óróligastu tíðina á vetri, og tá virkaðu miðini fyri fiskin sum havnir á ferðini, har lívd og føði fekst eina løtu. Annars helt fiskurin seg mest á friðarligum djúpum vatni, og Svabo helt, at longri úti til havs mundu fleiri havmið og bankar vera, sum eingin enn kendi nakað til. Hann hevði hoyrt frá einum av føroyingunum, sum hevði verið við einum av royndarskipunum, at teir funnu eitt slíkt mið. Hann hevði eisini hoyrt frá eini skotskari slupp, at teir nakrar míl úr Suðuroynni høvdu rent seg í eitt „Fiske- eller Torske-Bjerg". Tí helt hann, at ein uppløgd uppgáva var at gera kort av øllum miðum og bankum í sjóøkjum, sum danska ríkið varaði av (Svabo 1976: 87).

Henda frágreiðingin passaði eisini væl til uppáhaldið um, at tað var Kyndilsmessan harða, sum gjørdi, at fiskurin hvarv av grunnunum tíðliga í 17. øld. Svabo hugsaði sær, at ódnarveðrið hevði kollvelt botnin nógvastaðni, so at sjógvurin fór við miðum, skallum og gróti á botni, og tá misti fiskurin sínar havnir (Svabo 1976: 104).

Sjálvt um Svabo hevði onkur boð uppá, hvussu bøtast kundi um fiskaríið, so var hansara niðurstøða greið. Hon var, at stóra óvissan gjørdi, at „det færøeske Fiskerie mere [bør] ansees for et Huusholdnings end Handels Fiskerie.... og da Jordbruget, aldrig er saa misligt, som Fiskeriet; Saa bør samme altid være Landbruget *subordineret*". Greiður samanhangur var millum vetrarfiskarí og hosuarbeiði, tí um bóndin hevði nóg mikið av ull at arbeiða, gjørdi hann heldur

tað enn at fara út á hav til óvissa fiskieydnu. Var minni av ull, var áhugin størri fyri at fara út við báti. Svabo endaði partin um forðingar fyri fiskivinnu við at siga, at „Vist nok vilde Jordbruget og Fiskeriet drives til større Fuldkommenhed, om Bonden ikke var Fisker, og Fiskeren ikke Bonde, men Færøes nærværende Folke-Mangel, synes vist ikke at tillade, at disse Næringer bleve adskildte.“ (Svabo 1976: 111)

Sostatt trúði Svabo lítið upp á fiskivinnuna, soleiðis sum samfelagsstøðan var, og hann tók undir við fatanini hjá Lund um, at fiskivinna í mesta lagi kundi gerast stuðul hjá landbúnaðinum. Hann var kortini eisini greiður yvir, at fiskivinnan kundi fara at mennast, tá ið fólkagrundarlagið var nóg stórt til at skilja hana sundur frá landbúnaðinum.

## *5.5 Born kommandantur eggjar til fiskivinnu*

Tá ið Born skrivaði sínar viðmerkingar til frágreiðingina hjá Svabo, rósti hann honum fleiri ferðir, men Born var kortini als ikki samdur við Svabo um møguleikarnar, sum lógu í fiskivinnuni. Ein orsøk til, at teir høvdu hvør sína fatan av framtíðar møguleikum í fiskivinnuni var, at teir høvdu hvør sína hugsan um nyttuna av náttúrutilfeinginum.

Hesin munurin á hugburðinum hjá Svabo og Born til, hvussu náttúrutilfeingið skuldi brúkast, er eitt gott dømi um skiftið í náttúruhugsan, sum hendi í sambandi við ídnaðarkollveltingina og framvøksturin av kapitalistiskum búskapi. Svabo var í stóran mun samdur í hugburðinum í gamla bóndasamfelagnum um, at meir ikki skuldi takast úr náttúruni, enn tørvur var á, og ansast skuldi alla tíðina eftir, at tilfeingisnýtslan ikki hevði skaðiliga ávirkan á náttúruna. Hjá Born sæst týðiliga, at hann var væl og virðiliga ávirkaður av nýggja kapitalistiska hugburðinum til, hvussu náttúrutilfeingi skuldi troytast, tí fyri hann ráddi um at taka tilfeingið, meðan tað var har. Restina skuldi Gud nokk taka sær av.

Í dag tykist tað løgið at skriva, at tað var hugburðurin hjá Born, sum var tann modernaði, men longu við royndunum hjá sluppini „Haabet“ lærdi Born, at tað var ein stór avbjóðing at broyta náttúruhugsanina hjá føroyingum. Tað skuldi vísa seg, at ein slík hugsburðsbroyting var ein fortreyt fyri, at ein modernað fiskivinna kundi fáa fótin fyri seg. Av tí at hesin hugburðurin er so nær knýttur at samfelagsskipanini, ber ikki altíð til at skyna á, um tað er gamla samfelagsskipanin ella gamli náttúruhugburðurin, sum koma at standa í vegin fyri menningini av einari fiskivinnu, men hesin trupulleikin minnir ótrúliga nógv um tað kjak, sum síðstu mongu árini hevur verið í Føroyum um, hvussu fiskatilfeingið á føroyskum øki best verður gagnnýtt. Nú er stóri spurningurin bara, hvussu man sleppur burtur úr kapitalistisku náttúruhugsanini og aftur til ein meira burðardyggan hugburð.




*Born kommandantur helt, at kópurin átti at verið útruddaður, tí hann tók ov nógvan fisk. Hann væntaði kortini ikki, at hann fór at fáa undirtøku fyri tí, so leingi sum føroyingar hildu seg vera ættaðan frá kópi í 9. liði. Kanska var hesin áhugin fyri kópaveiðuni við til at gera, at henda myndin gjørdist partur av kortinum hjá Born. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Sambært Born gjørdu bæði gamlar samfelagsskipanir og náttúruhugsan sítt til, at lítið fekst burtur úr kópaveiðuni. Gamla skipanin við býti av lunnindum í bóndabygdunum gjørdi sítt til, at leti og ósemjur sluppu at forða fyri, at kópur varð troyttur so nógv, sum hann átti at verið. Úrslitið varð, at ov nógv var til av hesum sjórovdýrinum, og tað var til stóran skaða fyri fiskivinnuna, tí kópurin tók nógvan fisk, og hann fekk eisini skylduna fyri, at tað var so torført at fanga sild á firðunum. Samanlagt helt hann, at tað kanska var best, um man bara royndi at útrudda kópastovnin. Aðrastaðni fingu fólk virðislønir fyri at finna nýggjar mátar at fanga og drepa kóp, og tað átti man kanska at gjørt her eisini. Born væntaði kortini ikki, at tað fór at verða undirtøku fyri tí, so leingi sum føroyingar roknaðu seg at vera ættaðar frá kópi í 9. liði.[48]

Born var heldur ikki samdur við Svabo um, at neyðugt var at avmarka veiðuna eftir fugli. Born helt, at fuglabjørgini kundu geva 10 ferðir so nógv, sum tey góvu. Hann vísti á søguna hjá Svabo um, at ein maður hevði verið í Lítlu Dímun eitt summar og fingið hópin av fugli. „Hvorfor følger man ikke hans Exempel i denne Tid, saavel der som i eldre Fuglebierge? Og hvorfor opmuntrer man ikke alle i Færøe til Opfindelse af slige og andre nye Methoder at fange Fugl paa?“[49].

48 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 10. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.

49 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 5. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.



*Born kommandantur hevði fleiri hugskot um, hvussu fiskivinnan kundi mennast. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Honum dámdi tí heldur ikki, at Svabo hevði víst á, at statsmenn aðrastaðni vóru farnir at gera lógir, sum skuldu fyribyrgja, at høvini tømdust (Svabo 1976: 40). Hann helt, at tað kundu vera aðrar orsøkir til slíkar lógir, tí bretar og fransmenn fóru ikki á New Foundlands bankar, fyri at fleiri toskar skuldu vera eftir í havinum, men heldur fyri at fáa yvirskot og vinning. „England synes, at dens Kyster endnu ikke nok er udtømmet. Thi det encouragerer Undersaatterne med aarlige Præmier til Fiskeriets bedre Drift omkring heele Brittain. Her tænkes altsaa ikke paa Torskens, Sildens og andre Fisks Skaansel, men man fanger hvad man kan faae, og lade Gud sørge for Resten."[50]

Í sínum viðmerkingum tók Born eisini tráðin upp í sambandi við tær viðmerkingar, sum Svabo hevði havt til úttalilsið hjá Lund um, at Gud ikki hevði ætlað Føroyar til fiskivinnu. Born visti, at tað viðhvørt kom fyri, at so nógvur fiskur var at fáa, at snørið ongantíð kom á botn, og at tað stóð á at draga fiskin upp. Í slíkum líkindum kundi ein bátur fyllast upp á minni enn ein tíma á t.d. Dánjalsmiði norðanfyri. Men so skuldi bíðast eftir sjóvarfallinum, áðrenn manningin kundi rógva til lands við fiskinum. Við øðrum orðum fór meginparturin av tíðini til at rógva til og frá miðinum og ikki til at fiska. Loysnin upp á henda trupulleikan

50 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 4. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.

var at fáa eitt skip at liggja við miðið og taka ímóti fiski frá bátunum. Við eini slíkari skipan megnaðu 10 útróðrarbátar at fylla eitt heilt skip upp á ein dag, tá ið líkindini vóru góð, og nógv var at fáa. Hetta hevði eisini forðað fyri, at bátar tóku ov nógvan fisk umborð og síðani noyddust at blaka hann útaftur, tá ið teir rendu seg í onkra íðu. Retoriskt spurdi hann: „Hvor godt var det da ikke, om vi kunde flytte vor Øe – kunde ikke Skibet være det? – hen til Stedet, hvor der er Overflod af Guds Velsignelse?“[51]

Born ásannaði, at tað ikki fór at verða líka góður fiskiskapur á hvørjum ári, og á tann hátt gav hann Svabo rætt í, at fiskivinna var ein óstøðug vinna. Eitt ár kundi nógvur fiskur standa heilt inni við land, men tað næsta var fiskurin longri úti, enn bátar tordu at fara. Aðrar tíðir kundi so nógvur mjørki vera, at tað ikki bar til at síggja land og harvið bar heldur ikki til at finna miðini, har fiskur var at fáa. Afturat hesum gjørdi skiftandi veður sítt til at gera fiskivinnuna óstøðuga. Spurningurin var, um hesir trupulleikar ikki kundu loysast við at samantvinna útróður við báti við skipsfiskiskap. Tí ivaðist Born ikki sjálvur í, tí hann var vísur í, at føroyingar høvdu fiskað longri til havs fyrr í tíðini, tá ið føroyingar áttu skip at sigla til Bergens við. Hann ivaðist heldur ikki í, at tað í havinum kring landið vóru fleiri bankar fullir av fiski, sum eingin kendi til longur. Sjálvur hevði hann sæð eitt svenskt kort, har ein banki á 65 favna dýpi var avmerktur 5 míl í ein lágan vestan úr Suðuroynni, og hann hevði hoyrt líknandi bankar bæði sunnanfyri, eystanfyri og norðanfyri umrøddar[52].

Born visti eisini at siga, at vanliga fatanin í Føroyum var, at fiskur, sum varð veiddur langt úr landi, var feitari enn fiskur fingin inni við land. Fiskur fingin á djúpum vatni var eisini feitari enn fiskur longri uppi í sjónum. Spurningurin gjørdist tí: „Var altsaa dækkede Fahrtøier ikke beder end aabne Baade, med hvilke man sielden tør søge langt til Havs?“ Útlendskur fiskiskapur stiðjaði undir hetta sjónarmið, tí árið fyri høvdu tvær bretskar sluppir fiskað ávikavist 3000 og 2000 toskar umframt kalva, og Born dugdi ikki at síggja, hvussu forðast kundi fyri, at hesi skipini fiskaðu við betri agni og aðrari útgerð enn føroyingar. Skuldi tað gerast, mátti eitt verjuskip liggja í Føroyum alt árið[53].

Born hevði sjálvur roynt at virka klippfisk, og klippfiskur var vorðin vanligari í Føroyum, síðani Svabo skrivaði sína frágreiðing. Born hevði virkað meir enn 20 lispund, og hann hevði bæði brúkt tann íslendska mátan og tann nýfundlendska mátan. So vítt sum hann visti, hevði eingin úti á bygd roynt at eftirapað sær[54].

---

51 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 11. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.

52 Ibid.

53 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 14. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.

54 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 13. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.

Hesin síðsti spurningurin um at taka við tí, sum onnur hava víst bar til, var ein gjøgnumgangandi hugburður hjá Born. Hann helt, at tey fremmandu fólkini, sum høvdu arbeitt í Vágsbotnshandlinum hjá Ryberg, høvdu havt ovurstóra ávirkan, tí fólk í Havn tóku við tí nýggja, sum tey komu við. Á tann hátt ivaðist hann ikki í, at hesi fremmandu høvdu havt størri ávirkan í 10 ár, enn Landhusholdningsselskabet við øllum sínum tileggjanum, peningastuðli, áheitanum, prædikum og smáritum hevði kunnað fingið í 50 ár. „Emulation" var rætti vegurin fram, og herróp hansara gjørdist í so máta: „Fremmede iblandt os! og dem bevilget Jord og Frihed, er altsaa nærmeste Vei til vor Forbedring, samt til Tankens og Fordommenes Adsprædelse, af hvilke vi hidtil have været omringede. Men der hører gode fornuftige Styrmænd til at seile i Færøe denne Cours."[55]

Sostatt sá Born stórar møguleikar í eini framtíðar fiskivinnu, og besti vegurin fram var í hansara hugaheimi at lata landið upp fyri fremmandum, sum føroyingar so kundu eftirapa. Hesin hugburðurin gongur beint ímóti øllum tí, sum eyðkendi leiklutin hjá tí veika statinum í javnvágsfelluni, tí hjá statsins embætismonnum ráddi um at halda landið stongt, tí tað var einasti ella í øllum førum lættasti vegurin at hava tamarhald á tí ríkispartinum, teir vóru settir at stýra.

Tað er áhugavert at seta spurningin, hvussu gongdin hevði verið, um Born hevði fingið somu heimildirnar sum fulltrúi hjá stiftamtmanninum, sum Løbner kommandantur fekk nøkur ár seinni, tí so høvdu Føroyar kanska verið meira og skjótari ávirkaðar av teimum nýskipanunum, sum hendu í danska ríkinum í 1780-árunum. Løbner kommandantur hevði kortini eina heilt øðrvísi fatan av fiskivinnuni og framtíðini í Føroyum, og tað gjørdi helst sítt til, at tær hugsanirnar, sum nevndin, sum Born var limur í og sum í 1790 avgjørdi, at Einahandilin skuldi avtakast, og at fiskivinnan skuldi stuðlast, ikki fingu so góð gróðrarlíkindi í Føroyum. Ymiskar hugsanir hjá skiftandi embætismonnum gjørdu sítt til at gera broytingar torførar at gjøgnumføra.

## *5.6 Nevnd knýtir fríhandil og fiskivinnu saman í 1790*

Sum ávíst í kapitli 4.12, helt nevndin, at tryggleikin í skipanini við Kongligum einahandli hevði hildið føroyingum aftur í at royna seg í m.a. fiskivinnuni. Nevndin skeyt upp at gera eina skipan, so at prísirnir í handlinum samsvaraðu betur við prísirnar á altjóða marknaðinum. Tað hevði m.a. við sær, at prísurin á fjøðuri, tálg, lýsi og fiski nærum tvífaldaðist, og ein slík prísbroyting átti at eggjað føroyingum til at gera meira við hesar vinnur, og á tann hátt kundi gongd koma á eina kreativa niðurbróting av stagneraðu hosuframleiðsluni. Økt framleiðsla

55 Viðmerkingar Borns til Indberetninger hjá Svabo, s. 19. Í eskjuni E 641 í Handritagoymsluni hjá Landsbókasavninum.

var besti mátin at fyrireika íbúgvarnar upp á fyrimunirnar við fríum handli, og serliga um fiskivinnan vant uppá seg, fór tað at fáa stóra ávirkan.

Ítøkiliga prísbroytingin var, at prísurin á einum pundi av turrum fiski hækkaði úr tveimum skillingum upp í tríggjar, og prísurin á einari tunnu av saltaðum toski hækkaði úr trimum ríkisdálum upp í seks ríkisdálar[56]. Hetta líktist teirri prísbroytingini, sum Debes og Lund 20 ár frammanundan mæltu til, men á talvuni niðanfyri sæst, at tann vøksturin í avreiðingum, sum bæði teir og nevndin, sum viðgjørdi føroyska handilin í 1790, vónaðu fór at koma burturúr, ikki gjørdist so stórur, sum væntað. Prísurin á turrum fiski hækkaði í 1801 til 3½ skilling fyri pundi og í 1805 til 5 skillingar fyri pundi, men tað sær heldur ikki út til at hava havt serliga stóra ávirkan, tí gongdin í avreiðingunum av turrum fiski var framvegis merkt av ógvuliga skiftandi tølum, og útflutningurin av saltfiski hevði ógvuliga torført við at koma í gongd, og so hvørt, sum prísurin á turrum fiski hækkaði, minkaði tað um hugin at lata handlinum saltfisk (Degn 1929: 21).

**Talva 5.2**




*Kelda: (Degn 1929: 137–138)*

Jonathan Wylie nevnir tvær orsøkir til, at tað ikki eydnaðist at seta gongd í nakra fiskivinnu við hesum prísbroytingunum. Onnur var, at samstundis sum handilin tillagaði prísin á fiski til altjóða marknaðarprísir, so helt hann í reglugerðini frá 1790 fast í, at hosuprísurin ikki skuldi lækkast so nógv, sum nýggja skipanin við

56 Forordning om en nye Interims Indretning med Handelen paa Færøerne for 5 Aar, Frederiksberg Slot den 13de August 1790, s.11-12. Av heimasíðuni www.history.fo.

skiftandi prísum annars legði upp til. Tað merkti, at handilin framvegis eggjaði til framleiðslu av hosum og „thus discouraged what eventually proved to be the key to the Faroes' economic development, the commercial exploitation of the sea." Hin frágreiðingin var tann gamla við, at „fishing is, of course, a notoriously uncertain business, and these were bad fishing years." (Wylie 1987: 67).

Nakað er helst um hesar grundgevingarnar, men somu grundgevingar kundu eisini verið nýttar til at greitt frá broytingum í grindatølunum, og har sæst, at gongd kom á veiðuna og harvið á útflutningin av grindalýsi, samstundis sum nýggju prísirnir komu, og hesin vøkstur helt áfram næstu hálvu øldina (Isholm 2016). Hesin munurin á, hvørja ávirkan prísbroytingarnar høvdu, ger, at leitast má eftir onkrari aðrari frágreiðing. Tann mest nærliggjandi frágreiðingin er, at grind sum vinna passaði betur inn í karmarnar á gamla bóndasamfelagnum, enn ein vinnulig fiskivinna gjørdi. Tí skuldi ein kreativ niðurbróting av hesum kørmum til, áðrenn grundarlag var fyri vinnuligari fiskivinnu, og tað kundi ikki bara gerast við príspolitikki.

Nevndin avgjørdi eisini at brúka meira enn bara príspolitikk til at eggja til økta fiskivinnu, tí hon kom fram til, at føroyingar, sum høvdu hug til at reka fiskivinnu „i det Store", skuldu kunna fáa stuðul frá tí almenna. Henda ásetingin var í § 17 í lógini, og hon var soljóðandi:

> De, der paa Færøerne ville drive Fiskerierne i det Store, og til almindelig Brug indføre bedre Virkningsmaader, end de hidtil brugelige, kunne vente, at dem dertil skal vorde forundt særdeles Understøttelse efter Omstændighederne. I særdeleshed ville Vi være betænkte paa, hvorledes Landets Indbyggere, naar de lægge Vind paa at udvide og forbedre Fiskerierne, fornemmeligen Havkalve- og Sælhunde-, samt Silde- og Flyndre-Fangst, kunne med det fornødne til beqvemme Redskabers Anskaffelse vorde forsynede og understøttede, efter Omstændighederne og Øvrighedens nærmere Forestilling, helst for saavidt saadanne Anlæg foretages i det Store, og kunne have nogen betydelig Indflydelse paa Handelen.[57]

Henda áseting var helst ein orsøk til, at havnarmenn í 1791 aftur royndu at fáa skipsfiskiskap at bera til. Hesa ferð vóru tað skipararnir Sámal Egholm og Skipar Hansen, sum í síni tíð hevði siglt fyri Rybergs handil. Saman við teimum var bróður Sámal, Jóhan Hendrik Egholm, sum var bóndi í Hvalvík. Teir høvdu í mong ár havt samband við eingilskar fiskimenn, og frá teimum høvdu teir fingið bæði hug til og vitan um fiskaríið kring Føroyar. Hesir bretarnir vóru teir einastu, sum teir vistu um, sum høvdu roynt á føroyskum øki, og teir søgdu, at fleiri ríkir bankar vóru kring oyggjarnar. Tað var eisini sjón fyri søgn, tá ið skipini viðhvørt vóru noydd til at fara í føroyska havn við fullari last. Teir mistu ikki vónina av, at allar royndir, sum higartil vóru gjørdar, vóru miseydnaðar.

57 Forordning om en nye Interims Indretning med Handelen paa Færøerne for 5 Aar, Frederiksberg Slot den 13de August 1790, s.11-12. Av heimasíðuni www.history.fo.

Tað vóru útlendingar, sum høvdu gjørt hesar royndir, og høvdu teir føroyskan loðs umborð, so vóru teir komnir við „mere af Tvang end af sand Lyst“, og teir høvdu bara hugsað um at fingið skipini í trygga havn. Um seg sjálvar søgdu teir:

> Vi 2de Skippere bosiddende i Færøe har i en rum Tid sejlet fra og til dette Land, er Strømmene, alle Havne og en Del Meder og Fiskebanker bekendt og overalt drives af en særdeles Lyst til Fiskerierne; men Evnen, som det vigtigste, til at forskaffe os et lukket Fartøj for at sætte dette landnyttige Forsøg i sandt Lys, fattes os. (Nolsøe 1984: 46)

Teir vónaðu, at kongur kundi stuðla teimum í at fáa til vega eitt gott skip á umleið 20 kommerselæstir, og helst skuldi tað vera ein slupp, tí teir ivaðust ikki í, at tað var besta skipaslagið til fiskivinnu undir Føroyum. Teir vístu til tann stuðulin, sum íslendingar fingu, og søgdu, at teir ætlaðu „saa at sige at bryde Isen.“

Heilt vísir vóru teir ikki í, at tað fór at bera til at fáa fiskivinnu undir Føroyum at bera seg, og tí søgdu teir, at um tað eftir fleiri royndir vísti seg, at várfiskiskapur undir Føroyum ikki loysti seg, so kundu teir halda fram við at fiska undir Íslandi undir somu treytum. Teir vildu eisini hava møguleikan fyri at leggja um til at flyta frakt við skipinum, og ítøkiliga hugsaðu teir sær, at teir kundu flyta kol úr Hvalba til Keypmannahavnar. At enda bóðu teir um loyvi til at brúka konglig pakkhús at goyma salt og annað í, og teir vildu, eins og vanligt var í Íslandi, sleppa at brúka fólk í havnum, har teir løgdu fiskin upp, sum bíliga arbeiðsmegi til at virka fiskin (Nolsøe 1984: 47).

Áhugavert er at síggja, at ein av grundgevingunum fyri, at staturin skuldi stuðla hesi ætlanini, var, at „vore Ønskers Opfyldelse vilde endog blive et sandt Gavn for mange af vores fattige Landsmænd, der i dette Fag følgelig kunde lære baade Sømandsskab og Navigation, som vilde være dem meget magtpaaliggende til den forestaaende Frihandel, at de forud havde faaet Undervisning om Sømandskabet.“ Fyri teir báðar skipararnar fór tað at verða ein heiður at undirvísa øllum, sum høvdu hug at læra navigatión (Nolsøe 1984: 47).

Hugsanin við skipakeypinum passaði væl við ætlanirnar, sum vóru uppi í tíðini, so tí hevði Rentukamarið ikki torført við at stuðla hesum skipakeypinum. Teir fingu játtaðar 600 ríkisdálar til skipakeyp, men teir kundu ikki fáa studning til raksturin, sum teir eisini høvdu søkt um. 26. november 1791 keyptu teir tríggir saman við ríkmanninum Ryberg galeasuna „De trende Brødre“ fyri 750 ríkisdálar. Teir fóru til fiskiskap undir Føroyum í mars 1792, men teir fingu ongan fisk, og heldur ikki undir Íslandi fingu teir tað at bera til. Tí mistu teir mótið og samdust í september um at sigla skipið aftur til Danmarkar við fiskinum, sum teir høvdu veitt, og nakað av koli umborð. Í Keypmannahavn fingu teir farm til eina ferð niður í Miðjarðarhavið, men ein kapari tók teir á vegnum. Tá ið teir komu aftur til Keypmannahavnar, avgjørdu teir at selja skipið (Nolsøe 1984: 49), og soleiðis

endaði henda ætlanini, sum kundi verið byrjanin upp á føroyska fiskivinnusøgu, um úrslitini høvdu lagað seg eitt sindur øðrvísi.

## 5.7 Løbner og Nólsoyar Páll - Fiskivinna vandamikil fyri veika statsvaldið

Meðan einki sæst til, at nøkur mótstøða var ímóti fiskivinnuætlanini við „De trende Brødre“, var støðan ein heilt onnur við teirri næstu fiskivinnuverkætlanini, tí henda verkætlanin elvdi til eina av teimum mest umrøddu søgunum í føroyskari søgu. Næsti maður at søkja um stuðul til fiskiskip var nevniliga Nólsoyar Páll. Hann søkti í 1801 um stuðul frá Handilsstjórnini at fáa til vega eitt fiskiskip at gera royndarfiskiskap við. Handilsstjórnin stuðlaði uppskotinum, men handilsnevndin noktaði, eftir at hon hevði fingið viðmerkingar frá Egtved handilsforvaltara. Í staðin spurdi nevndin, um ikki onkrir meira álítandi menn vóru í Føroyum (Joensen 1981: 61–62).

Árið eftir søkti Nólsoyar Páll aftur. Hesa ferð søkti hann saman við tveimum bóndum í Suðuroy um at fáa 1500-2000 ríkisdálar í láni frá Rentukamarinum. Teir høvdu eisini eitt bræv frá krúnprinsinum at styðja sær, men aftur hesa ferð sær út til, at tað var persónurin Nólsoyar Páll, sum var forðingin fyri, at stuðul kundi veitast (Joensen 1981: 62). At tað var persónurin Nólsoyar Páll, sum var trupulleikin, heldur enn at ynski um at menna fiskivinnu var slept, kom greitt til sjóndar 6. august 1807, tá ið Handilsnevndin skrivaði, at „man opfordrede derimod Handelsforvalteren til at bestræbe sig for at formaa Mænd i Landet, af erkendt Paalidelighed, til at forsøge en saadan Entreprise, til hvilken de i dette Fald kunde vente al mulig Understøttelse fra Handelens Side.“ Men nevndin hevði ikki góðar vónir um, at tað fór at gerast meira enn eitt ynski, so leingi sum handilin ikki var fríur og gav reiðarum møguleikar at brúka síni skip uttan avmarkingar av ymiskum slag (Degn 1929: 33).

Júst hví Handilsnevndin skuldi hava so nógv ímóti Nólsoyar Pálli er ikki til skjals í tí, sum skrivað er um hann. Søgan um Nólsoyar Páll hevur annars verið ein av mest umrøddu søgum í føroyskari søguskriving, síðani Jakob Jakobsen tók hann fram í sambandi við, at Føroyingafelag í Keypmannahavn í 1880-árunum fór undir at finna fram nakrar tjóðarhetjur, sum kundu brúkast sum fyrimyndir í tjóðarbyggingini. Jakob Jakobsen hevði í 1891 langa grein um Nólsoyar Páll í danska Historisk Tidsskrift (Jakobsen 1891), og árið eftir gav hann hesa greinina út í bók. Hann gav sama ár eisini út „Fuglakvæði“, sum var høvuðsverkið hjá Nólsoyar Pálli, har hann lýsir seg sjálvan sum tjaldrið. Tað er so aftur orsøkin til, at tjaldrið verður roknað sum tjóðfuglur í Føroyum.

Allar hesar útgávur gjørdu, at Nólsoyar Páll gjørdist ein av teimum stóru hetjunum í tjóðskapartíðarskeiðnum. Hesin upprunin og henda støða hansara gjørdu, at nógvar mytur vórðu knýttar at søguni fyri at fáa hann at passa so



*Nólsoyar Páll brúkti tjaldrið sum ímynd upp á seg sjálvan í Fuglakvæðnum. Tað gjørdi, at tjóðskaparrørslan síðst í 19. øld tók fuglin til sín sum tjóðfugl og nýtti hann sum flaggmerki. (Mynd: Tjóðsavnið)*

væl til tjóðskaparhugburðin, sum til bar. Fleiri søguverk hava síðani borið hesa søguna víðari,[58] og í nýggjari tíð hevur tað eisini elvt til eina uppgerð við hesa tjóðskaparmytu[59]. Nólsoyar Páll er tí framvegis ein ógvuliga umstríddur persónur í søguni, og tað ger, at tað er umráðandi at brúka mongu frágreiðingarnar um hann við serligum keldukritiskum umhugsni. Her verður søgan um Nólsoyar Páll stutt gjøgnumgingin við serligum atliti til at royna hana upp í móti ástøðinum hjá Eggertsson um, hví ein veikur statur hevði trupulleikar við einari mobilari fiskivinnu.

Tá ið tað ikki eydnaðist at fáa stuðul til skipakeyp, tóku teir tríggir, sum høvdu søkt, avgerð um at keypa burtur av rovunum av einum skipi, sum vóru á uppboði í Suðuroy. Teir fluttu tilfarið til Vágs, og á Fløtuni Fríðu bygdu teir skonnartina „Royndina Fríðu", sum verður roknað sum fyrsta skip, ið bygt er í Føroyum síðani miðøld. Um endamálið við at byggja skipið varð í sýnsbrævinum nevnt, at teir „havde bygget omberørte Fartøj i den Hensigt fornemmelig at bruge samme til Fiskeri herom Landene, hvor saadant hidtil ikkun har været drevet med smaa

58 Her kann m.a. vísast til (Nolsøe 1984: 50–167), (Debes 2000: 57–80), (Nolsøe og Jespersen 2004a: 42–53) og (Olsen 2016).

59 Her kann serliga vísast til fýra fyrilestrar, sum Joen Davidsen helt í Fróðskaparfelagnum í november 1984, sum elvdu til hvast kjak, og til m.a. (Simonsen 2012: 233–242) og (Simonsen 2015).

aabne Baade, der om Aftenen igjen maatte til Lands, og altsaa ej at kunde have rakt noget til Søs i det formentlige rette Fiskeri."[60] (Olsen 2016: 56).

6. august 1804 var klárt at flota skipið, og 22. august vóru teir úti á Føroya banka. Seinni í september royndu teir eystan fyri Svínoynna, og Nólsoyar Páll hevur sjálvur greitt frá, at hann her „traf paa 3 store Fiskebanker, hvor jeg traf en betydelig Mængde med Fisk". Men skipið hevði onga hekku, og tí avgjørdi Nólsoyar Páll at leggja skipið fyri veturin (Nolsøe 1984: 56).

Árið eftir fóru teir út at fiska í apríl, men eingin fiskur var at fáa, og tí avgjørdi Páll at royna at gera ein frakttúr við koli í staðin. „Royndin Fríða" var ein túr í Bergen og ein í Keypmannahavn summarið 1805. Í Keypmannahavn royndi Nólsoyar Páll at fáa farm heim aftur við, men tað fekk hann ikki, tí tað var ikki loyvt sambært lógini frá 1790.

Veturin 1805/6 keypti Nólsoyar Páll vørur, sum ikki vóru á takstlistanum, tað var m.a. troyggjur, lýsi og turrur fiskur, tí hann helt, at tá ið tað var frítt at handla við slíkum vørum, kundi hann eisini flyta tær við skipi sínum. Henda handlingin gjørdist á mangan hátt lagnustundin hjá honum, tí nú hevði hann í veruleikanum tikið kappingina upp við Einahandilin, og tað gekk ikki, soleiðis sum viðurskiftini vóru skipað. Handilsforvaltarin frætti sjálvandi, at Nólsoyar Páll keypti vøru, og 31. januar 1806 boðaði hann sorinskrivaranum frá, at hann helt slíka handilsferð, sum Nólsoyar Páll hevði í ætlan, vera ólógliga sambært handilslógini frá 13. august 1790 (Nolsøe 1984: 60). Sorinskrivarin legði klaguna fyri Nólsoyar Páll, sum svaraði, at hann ætlaði at „danne dem (Landets Indfødte) til Sømænd", og um fiskiskapurin ikki var góður, ætlaði hann at sigla við frakt (Nolsøe 1984: 61).

Á vári slapp Páll avstað, men tá ið hann kom aftur í juli, endaði tað við drúgvum rættarmálum um ymisk viðurskifti. Hesum er alt greitt væl og virðiliga frá í teimum verkum, sum skrivað eru um Nólsoyar Páll, so ongin orsøk er til at endurtaka tað her. Kortini sæst greitt í rættarmálunum, at embætismenn ivaðust stórliga í, um ætlanin við skipinum veruliga var at fiska, tí skipið hevði verið í Føroyum í allar besta fiskiveðri uttan at gera nakað við tað (Nolsøe 1984: 93). Við øðrum orðum óttaðust teir fyri, at fiskurin bara var ein umbering fyri at fáa hendur á eitt skip, og at farmasigling var veruliga endamálið.

Samstundis sum rættarmálini vóru viðgjørd, kom ein umsókn til Løgtingið frá suðuroyingum um at fáa fríhandil í oynni. Nólsoyar Páll tók undir við suðuroyingunum og legði sjálvur fram eitt líknandi ynski úr Norðoyggjum, men á tingi var eingin undirtøka fyri málinum. Allir sýslumenninir og allir løgrættumenninir søgdu, at teir høvdu ongantíð hoyrt nakað um, at nakar í teirra sýslu ynskti at fáa fríhandil. Tí vóru tað bara suðuroyingarnir sjálvir, sum tóku

60 Í fyrilestrum sínum var Joen Davidsen rættiliga ivaleysur í, at hetta sýnsbrævið var eitt falsum, tí júst útsagnir av slíkum slag, sum her eru endurgivnar, hoyra ikki heima í einum slíkum. Rolf Guttesen hevur seinni í grein í tíðarritinum Frøði sagt, at brævið helst er eitt viðmæli til eina umsókn, sum Nólsoyar Páll sendi til Landhuusholdningsselskabet um at fáa viðurkenning fyri sínar fiskivinnuroyndir (Guttesen 2017b: 23).

undir við uppskotinum, og Norðoya sýslumaður vildi ikki rættiliga kennast við áheitanina, sum Nólsoyar Páll legði fram, tí har norðuri høvdu fólk sagt, at tey ynsktu onga broyting í handilsskipanini (Nolsøe 1984: 115).

Tað fekk kortini ikki Nólsoyar Páll at missa mótið. Tvørturímóti skrivaði hann eina áheitan, sum fór kring landið, um at fáa fólk úr øllum bygdum at savnast í Havn 25. august 1806. Á fundinum var ætlanin at fáa undirtøku fyri at senda eina sendinevnd til kongs at biðja um betri handilsviðurskifti. Formaður fyri nevndini skuldi Nólsoyar Páll sjálvur vera. Í brævi til Rentukamarið er týðiligt, at hetta órógvaði embætismenninar í Føroyum. Tað var helst Løbner kommandantur, sum skrivaði. Hann gramdi seg um, at Nólsoyar Páll ikki hevði boðað myndugleikunum frá hesum virkseminum, og at fleiri lygnir á henda hátt fingu gróðrarbotn í fólkinum. M.a. helt almúgan nú, at eingin nýggjur handilstakstur var komin til Føroya síðan 1790, og at lokalu embætismenninir bara sjálvir høvdu sett prísirnar, og at klagur um handilin og áheitanir um lægri kornprísir o.a. ongantíð vóru sendar av landinum. Løbner roknaði við, at tað var Nólsoyar Páll, sum var upphavsmaður til henda slatur. Sjálvur helt hann, at hetta var „fornærmeligt“ ímóti „de Høye Kollegier“, handilsstjórnini og teimum kongligu embætismonnunum. Ætlanin var at fara sama heyst, og peningainnsavning til ferðina var í gongd. Sjálvur helt Løbner ikki, at „vi finder os berettigede til at lægge den Hindringer i Vejen“, men hann vildi hava at vita, hvat Rentukamarið helt[61].

Tað gekst striltið at koma avstað, m.a. tí at fólk stuðlaðu við at lata Nólsoyar Pálli troyggjur heldur enn pening, og spurningurin gjørdist tí, um hann kundi fáa loyvi til at sigla við troyggjunum. Tí fór „Royndin fríða“ ikki fyrr enn 31. mai 1807. Hesa tíðina versnaðu viðurskiftini millum Nólsoyar Páll og embætismenninar enn meira. Tá ið Nólsoyar Páll var farin, skrivaðu Løbner og fútin til Rentukamarið um alla gongdina. Í hesum skrivinum greiða teir m.a. frá, at Nólsoyar Páll hevði yrkt „en Spottevise i det færøske Sprog, i hvilken han under Fuglestægten har ladet adskillige Embedsmænd her i Landet trine frem.“ Sjálvt um teir vistu, at vísan hevði verið seld kring landið, so var tað ikki eydnast teimum at fáa fatur á einum einasta eintaki, men teir noyddust at liva við, at børn sungu ørindini, sum snúðu seg um teir. Teir høvdu leystliga sæð skjalið, sum nevndin skuldi leggja fram í Danmark, og hildu, at har vóru „en Del Usandheder“ í tí. Sjálvir mæltu kommandanturin og fútin til, at teir, sum høvdu arbeitt saman við Nólsoyar Pálli, skuldu fyrigevast við „en alvorlig Irettesættelse“, tí tað var besti mátin at tryggja, at teir ikki aftur „lade sig forføre til lignende Handlinger.“ Hinvegin var eingin náði at heinta hjá Nólsoyar Pálli. Um hann skrivaðu teir:

> Skipper P. Nolsøe derimod fortjener efter vores Tanker paa det strengeste at revses, og maatte anses for formastelige, om vi vovede at indlægge vores underdangiste Forbøn for ham, hvis hele Fremgangsmaade bær fuldkommen

61 TSS. Færø Amt. Kopibók 1806-1809; Transscribering ved Rolf Guttesen, skjal nr. 39, bræv til Rentukamarið dagfest 20. september 1806.

Præg af Stempling, som kunde have haft de farligste Følger, om vi ikke havde valgt den mildeste Vej, og i Stedet for at tage alvorlige Metoder, ladet det bero indtil videre, paa det at det ej skulde lægges os til Last, at vi havde betaget ham nogen mulig Adgang til hans Forsvar, endmere, da han bestandig har beraabt sig paa hos Almuen, naar han kun kom til København til Høje Patroner – hvorfor man ogsaa har tillagt ham det Navn *den anden Bonaparte* – vilde disse Sager nok endes til hans Fordel (Nolsøe 1984: 129).

Í sitatinum omanfyri er týðuligt at síggja, eins og í søgugongdini í síni heild, at embætismenninir í Føroyum føldu seg hóttar av virkseminum hjá Nólsoyar Pálli, og teir vildu sleppa av við trupulleikan við at revsa hann hart. Heilt øðrvísi gekst, tá ið Nólsoyar Páll og hinir tríggir sendimenninir í Kiel hittu Fríðrik krúnprins, sum stýrdi landinum fyri sjúka faðir sín. Teir góvu krúnprinsinum áheitanina, sum fólk tóku undir við 25. august árið fyri. Millum ynskini hjá føroyingum var, at loyvi fekst til at føra farm fyri handilin, so at føroyingar kundu læra sjómansskap, so størri gagn í longdini kundi fáast burtur úr kolinum í Suðuroy og fiskivinnu við smærri skipum. Á henda hátt kundu føroyingar eisini venjast til komandi fríhandilin, so at teir tá vóru klárir at virka við egnum skipum og egnum fólki (Nolsøe 1984: 130).

Krúnprinsurin tók væl undir við hesi áheitan, og hann fegnaðist eisini um avrikið hjá Nólsoyar Pálli at byggja fyrsta skipið í Føroyum og helt, at hann hevði uppiborið „Opmuntring og langtfra at lægges Hindringer i Vejen.“ Hann gav 31. juli Rentukamarinum boð um at geva Nólsoyar Pálli farm at flyta heimaftur til Føroya. Tað hevði Rentukamarið frammanundan noktað fyri, so tað er týðiligt, at Rentukamarið endaði í einari tvístøðu millum prinsin og Nólsoyar Páll øðrumegin og embætismenninar í Føroyum hinumegin. Rentukamarið royndi at verja sína støðu og vísti m.a. á, at handilin seinastu 5 árini hevði givið 37.397 ríkisdálar í vinningi, men krúnprinsurin svaraði aftur við at siga, at hesin vinningur eisini kundi brúkast sum prógv um, at føroyingar guldu ov nógv fyri vørurnar í handlinum ella fingu ov lítið fyri sínar egnu vørur, og at tað tí vóru haldbarar klagur, sum føroyingar bóru fram (Debes 2000: 75).

Í Danska kansellinum vóru teir eisini fegnir um avrik Nólsoyar Páls, og har kom fram uppskot um at geva honum eina gullmedalju fyri at hava fingið koppavaksinu til Føroya, men Rentukamarið vísti á allar trupulleikarnar, sum høvdu verið av honum, og endin varð, at kanselliformaðurin Reventlow greivi fór at ivast í, um ein slíkur heiður ikki fór at geva honum „en Anseelse hos sine Landsmænd, som kunde give ham en skadelig Indflydelse“, og tí endaði tað við, at Kansellíið og Rentukamarið skuldu samskifta um, hvørt tað ikki var betur at lata hann fáa eina peningagávu heldur enn eitt gullheiðursmerki (Nolsøe 1984: 132).

Sostatt var støðan hjá ymiskum donskum myndugleikum sera ymisk. Meðan Fríðrikur krúnprinsur, sum hevði staðið á odda fyri nógvum nýskipanum í tíðini, sum hann var virkandi kongur fyri pápa sín, fegnaðist um tey stig, sum Nólsoyar Páll hevði tikið, so føldu embætimenninir í Føroyum hetta sum eina hóttan.

*Fríðrikur krúnprinsur tók væl ímóti Nólsoyar Pálli, tá ið teir hittust i Kiel í juli 1807. (Mynd: wikicommons)*



Ímillum lógu Rentukamarið og Kanselliið, sum ikki rættiliga vistu, hvørjum parti teir skuldu vera í. Nólsoyar Páll føldi í øllum førum, at hann hevði størri undirtøku, tess longur upp hann kom í almennu skipanini, og í Rentukamarinum skal eitt eygnavitni hava hoyrt hann tikið til: „Skade at de Herrer er saa langt borte fra os!“ (Muhle 1970a: 61). Spennandi hevði verið at sæð, hvussu víðari gongdin hevði verið í samskiftinum millum myndugleikarnar í hesum máli, men heilt aðrar umstøður gjørdu stutt eftir, at allir partar fingu annað at hugsa um, tí áðrenn „Royndin Fríða“ fór úr Keypmannahavn aftur, bumbaðu bretar býin 3.-5. september, og Danmark endaði á franskari síðu í Napoleonskríggjunum (Debes 2000: 75).

Nólsoyar Páll fekk loyvi frá bretsku hernaðarmyndugleikunum at fara til Føroya við kornfarmi sínum, men eftir at hann kom fram í oktober, gingu níggju mánaðir, til næsta skipið kom við farmi. Tá hevði capt. Baugh á bretska hernaðarskipinum „Clio“ tikið Skansan í Havn í mai, og í juni hevði Brillumaðurin gjørt um seg og tikið vørurnar í handlinum og annað. Tí var óttin fyri hungursneyð stórur, og fleiri ferðir var líka við, at tað endaði við rættiligum uppreistri. Løbner royndi at fáa Nólsoyar Páll at sigla niður við frágreiðingum um støðuna, men so leingi, sum hann noktaði fyri at lata „Royndina fríðu“ taka farm við sær, vildu reiðararnir ikki fara. 29. juni fór Nólsoyar Páll kortini sjálvur, og Løbner óttaðist fyri, at hann fór at koma aftur við einari last av korni, „som hann endogsaa kunde være nedrig nok til med eget Tab at sælge for ringere Priis, end det havde kostet ham

selv, allene for at bestyrke Indbyggerne i deres forudfattede Meening, saa vil det høie Kammers naadigst indsee, at om det i Forvejen ei er kommen til Udbrud, vil det da sikkert skee." (Nolsøe 1984: 158)

Hesum trupulleikanum slapp Løbner undan, tí Nólsoyar Páll kom ongantíð aftur til Føroya. Skip hansara varð tikið í Skagerak og ført til Gøteborg, har føroyingar vóru hildnir sum krígsfangar. Nólsoyar Páll fekk kortini greitt bretum frá støðuni í Føroyum, og tað gjørdi, at manningin á „Royndini Fríðu" varð førd til Londons at greiða frá. Har skipaðu bretar fyri, at Nólsoyar Páll fekk nýtt skip, „North star", og farm at flyta til Føroya. Í november ella desember fóru teir avstað úr Leith, men skipið kom ongantíð til Føroya. Longu í samtíðini vóru røddir frammi um, at tað var handilsstjórnin, sum onkursvegna hevði skipað fyri at gera av við Nólsoyar Páll, men teir, sum hava skrivað um lívssøguna hjá Nólsoyar Pálli, eru rættiliga samdir um, at tað ber illa til at hugsa sær (Nolsøe 1984: 166, Debes 2000: 78).

Um teir sjálvir høvdu skipað fyri tí, ella tað heldur var illveður ella fíggindaskip, sum gjørdi av við Nólsoyar Páll, so fegnaðust fútin og kommandanturin um at vera slopnir av við henda órógvandi mannin. Í frágreiðing til Rentukamarið 7. apríl 1809 ásannaðu teir, at skamtanin, sum var neyðug í einari støðu, tá ið hungurin stóð fyri durum, kundi elva til uppreistrarlyndi. Onkrir smávegis trupulleikar høvdu verið av tí, men „Naar vi altsaa undtager dette, saa har Vinteren i denne Henseende været temmelig roelig, dog skal vi ikke nægte, at Skp P. Nolsøes Fraværelse og Consorteri Taushed, som en følge hans Skiebnes Uvished, mueligt bør sees for at have biidraget noget hertil."[62]

Hetta dømi við Nólsoyar Pálli kann helst takast sum greið ábending um, at hald er í pástandi Eggertssons um, at so leingi, sum statsvaldið var veikt, vildi tað helst avbyrgja landið fyri at forða fyri „potential defectors" (Eggertsson 1996: 21). Fiskivinna, og mobiliteturin í henni, var ein hóttan móti hesi avbyrging. Royndirnar við Nólsoyar Pálli vístu embætismonnunum, hvussu skjótt ein ætlan at royna seg í fiskiskapi við egnum skipi kundi mennast til eina hóttan móti Einahandlinum og allari teirri galdandi samfelagsskipanini. Ætlanin hjá Nólsoyar Pálli samsvaraði væl við endamálið í § 17 í handilsreglugerðini frá 1790 um at stuðla monnum at reka fiskivinnu við skipi. Tí fegnaðist krúnprinsurin eisini um ætlanina, men hesin fagnaðurin fánaði, so hvørt sum komið varð longur niður í embætisskipanina, og fyri embætismenninar í Føroyum var talan beinleiðis um eina ta størstu hóttanina, teir høvdu upplivað. Av tí sama var hugurin at stuðla fiskivinnuni neyvan líka stórur í Føroyum, sum hann var longri uppi í almennu skipanini.

62 TSS. Færø Amt. Kopibók 1806-1809; Transscribering ved Rolf Guttesen, skjal nr. 295, bræv til Rentukamarið dagfest 7. apríl 1809.

## *5.8 Trý føroysk skip í 1810-árunum*

Sjálvt um Løbner og hansara starvsbrøður høvdu merkt, hvørjar avleiðingarnar kundu gerast av, at føroyingar fingu sær síni egnu skip, so bar illa til at steðga øðrum slíkum ætlanum, so leingi sum kríggið leikaði á, tí vørutrot var í Føroyum. Krígstíðin kravdi nøkur serlig átøk, sum eisini kom til sjóndar, tá ið eitt enskt handilshús fekk atgongd til føroyska marknaðin, sum greitt er frá í kap. 4.13, og roynt var eisini at fáa fatur á skipum at flyta vørur úr Føroyum og til Føroya.

Krígstíðin og tørvurin á at fáa skip at flyta vøru til og frá landinum sást aftur í navninum á fyrsta skipinum, sum varð bygt í Føroyum eftir „Royndina fríðu". Tað æt nevniliga „Nødvendigheden", og í einum brævi til sorinskrivarin boðaði Jákup Nolsøe 1. august 1810 frá vegna eigararnar, at nólsoyingar og suðuroyingar høvdu tikið seg saman at byggja skipið, tí neyðsynjarvørur vantaðu í Føroyum, eins og amboð og annað til fiskarí og hosuframleiðslu ikki vóru til at fáa hendur á. Tí var neyðin í durunum, og tað var fyri at forða fyri tí, at teir høvdu bygt skipið. Skipið var ein skonnart, mett til 14 tons. Nú skonnartin var komin til Havnar, var hon lastað við føroyskum vørum sum ullvørum, fjøður og lýsi, og ætlanin var at fara til Hetlands at vita, um neyðsynjarvøra fekst í býti við hesa føroysku vøruna. Skipari var Peter Hansen, sum eisini var við „De trende Brødre" 19 ár frammanundan (Nolsøe 1984: 169).

4. august fór „Nødvendigheden" avstað, men tá hon kom aftur 10. oktober, var tað við ongari last, og Claus Lund viðmerkti í dagbók síni, at „Rejsen i alt fatal." Í Leith vóru tveir av manningini farnir av skipinum, tí teir noktaðu fyri at sigla við so vánaligum fari, og har hevði gingist illa at sleppa av við vøruna. Skiparin hevði bara selt so mikið, at teir kundu keypa eitt sindur av provianti. Restin av vørunum kom heimaftur við, men tað mesta var helst spilt. Skiparin helt, at tollur var orsøkin til, at tað ikki slapst av við vørurnar í Leith (Nolsøe 1984: 170–171). „Nødvendigheden" gjørdi í 1811 nakrar túrar við koli úr Suðuroy til Havnar, men í juli var ætlanin sambært dagbókini hjá Claus Lund at fara til Hetlands at fiska. Sama dagbók veit at siga, at skipið var aftur í Havn 6. august, so neyvan hevur nógv verið fiskað. Nú sigldi skipið eini tveir túrar millum Havnina og Suðuroy, men tá ið hon 24. november fór av Havnini, skuldi tað vísa seg at gerast hennara seinasti túrur. Í ódnarveðri gingu bæði skip og manning burtur (Nolsøe 1984: 172).

Um somu tíð, sum „Nødvendigheden" gekk burtur, strandaði norðmaðurin Christen Olsen í Føroyum, eftir at skip hansara „Haakallen" kom illa fyri í ódnarveðri á veg úr Íslandi til Skotlands. Christen visti sær ongan veg av landinum aftur í teimum ófriðartíðum, sum tá vóru, og hann fór tí út til Nólsoyar og legði har kjølin til eina lítla skonnart. Áðrenn skonnartin var liðug, slapp hann kortini av landinum síðst í mai 1812, og tá tók Løbner kommandantur yvir. Hann fekk ein bróður Nólsoyar Páls at gera skipið liðugt, men meir enn eitt ár gekk, áðrenn

komið varð so langt. Orsøkin var helst, at tilfar av øllum slag vantaði orsakað av krígsstøðuni (Nolsøe 1984: 174).

Skipið varð 17. juni 1813 sleipað inn í Vágsbotn at gera liðugt, og meðan tað lá har, heittu fleiri embætismenn og menn við handilin á Løbner um at gera nakað við vørutrotið. Løbner boðaði frá, at hann longu var farin undir slíkar ætlanir, og 14. juli fór „Færøe" til Íslands við 137 føtum av lýsi. Aftur hesa ferð var Skipar Hansen skipari, men hann fekk einki korn í Íslandi. Nakað av tubbakki fekst eins og aðrar vørur, sum handilin ikki hevði tørv á, so endin varð, at Løbner sjálvur noyddist at selja hesar vørur. Í desember gjørdi skonnartin eina ferð til Bergens, har hon varð liggjandi fyri veturin. Árið eftir sigldi „Færøe" til Tróndheims fyri eina hollendska kuff, sum óttaðist fyri verða álopin av svenskum kaparum. Løbner hevði lítlan ella ongan vinning havt av skonnartini, og hann seldi hana til Handilsstjórnina fyri 2000 ríkisdálar. Ætlanin var at selja hana á uppboði í Keypmannahavn, og 14. juni 1815 fór ein danskur skipari avstað við henni (Nolsøe 1984: 174–180) Einki sæst til, at „Færøe" nakrantíð varð nýtt til fiskiskap.

Stutt eftir, at Napoleonskríggini endaðu, var sostatt einki skip í Føroyum, men afturfyri byrjaði vanliga siglingin skjótt aftur, nú friður var. Í 1817 fóru fýra nólsoyingar undir at byggja ein deksbát, og í brævi til Løbner amtmann 24. juni 1817 skrivaðu teir, at endamálið „med dette er fornemmelig Fiskeriets bedre Drivt, end hidtil er skiedt, paa de omkring Landet Færøe, endog længere til Søes beliggende og i de seenere Tider opdagede Fiskebanker", men teir høvdu eisini ein komandi fríhandilin, sum „er kommet os for Øren og vi med Skræk maa betragte saadan Handels Følger for Indbyggerne, om samme pludselig og uden den nødvendige Forberedelse skulde aabnes", í huga, og tí vildu teir brúka skipið til at sigla til Keypmannahavnar og har læra at gera seg kunnugar við farvatnið og danskar keypmenn og borgarar (Nolsøe 1984: 181).

Skipið var 5. juni 1818 siglingarklárt, og tað varð mett til at vera 9 tons stórt. Fyrsti túrurin var til Hvalbiar við einum timburfarmi, og ætlanin var seinni at fara til Danmarkar við einum kolafarmi. Til tess máttu teir søkja um loyvi frá myndugleikunum, og 5. oktober skrivaði Løbner amtmaður sínar hugsanir til Rentukamarið. Hann helt, at tað fór at verða ein vanlukka fyri umsøkjararnar, um hann viðmælti umsóknini, tí skipið var ikki meir enn ein stórur bátur. Harumframt helt hann, at umsøkjararnir vóru „et Par, blottet for al Kundskab om Søvæsenet, uerfarne unge Mennesker." Hann visti, at teir søgdu endamálið vera at royna fiskarí og finna nýggjar fiskibankar, og í so máta hevði hann lovað teimum sítt viðmæli til møguliga umsókn um stuðul, men hann ivaðist heldur ikki í, at endamálið við skipinum í veruleikanum var „en Smughandels Speculation", og tí var niðurstøða hansara, „at Sagen ikke er mindste Opmærksomhed værd." (Nolsøe 1984: 182) Rentukamarið gav nólsoyingum loyvi til ætlaðu ferðina, men tað bað Løbner fráráða teimum at fara, um hann helt tað vera vandamikið. Tað man hann hava gjørt, tí ferðin varð av ongum (Nolsøe 1984: 183).

Í svari Løbners er týðiligt at síggja, at hann framvegis óttaðist fyri, at fiskiroyndir við deksførum lata upp fyri møguleikanum at fáa samband við útheimin og fyri at fáast við handil, sum var ólógligur undir einahandilsskipanini. Tí var torført at stuðla handlinum og samstundis eggja til, at ein fiskivinna varð bygd upp í Føroyum. „Jubelfesten" fór at fiska bæði í 1819 og 1822, men tíverri vita søguligu keldurnar einki meir at siga um, hvussu gekst hesum skipinum og fiskivinnuroyndunum. Í øllum førum hava hetta ikki verið royndir, sum hava sett so stór spor eftir seg, at tað sæst aftur í seinni keldum. Keldurnar vita heldur einki at siga um, hvat víðari hendi við skipinum, og hvussu leingi tað var í Føroyum, men tað var í hvussu er ikki til í 1836 (Nolsøe 1984: 186).

Søgan um hesi trý skipini samsvarar væl við søguna um enska handilsfelagið, sum fekk serrættindi at virka í Føroyum, meðan kríggið leikaði á. Í kreppustøðuni, sum kríggið var, hevði kommandanturin sum virkandi amtmaður brúk fyri skipum, men so skjótt sum friður aftur valdaði, seldi hann skonnartina „Færøe", og tá ið nólsoyingar í 1817 aftur fóru undir eina skipaætlan, fekst ongin undirtøka fyri henni frá setta amtmanninum, sum tvørturímóti óttaðist fyri, at fiskiskapur fór at elva til loynihandil og onnur ólóglig sambond við útheimin. Gamla skipanin var komin fyri seg aftur.

## *5.9 1821-nevndin vildi eisini eggja til fiskivinnu*

Tá ið ein nevnd í 1821 viðgjørdi spurningin um frían handil í Føroyum, soleiðis sum greitt er frá í undanfarna kapitli, helt Løbner amtmaður ikki, at handilin kundi gerast fríur uttan nærri fyrireikingar. Hann mælti sjálvur til ymisk átøk at fyrireika landið til fríhandil, og eitt av teimum var, at føroyingar skuldu eggjast til at fáa sær deksfør til flutning og fiskivinnu. Hetta helt handilsstjórnin ikki nógv um, tí hon helt, „at Dæksfartøiers Anskaffelse, hvor gavnligt det end ellers kunde være, næppe vilde kunne betale sig under Monopolhandelen, eller iværksættes uden offentlig Understøttelse, ligesom slige Fartøier kunde friste til Snighandel."

Júst hetta við ólógligum loynihandli var nakað, sum Løbner sjálvur nevndi í sambandi við „Jubelfesten", men nevndin helt ikki, at vandin fyri ólógligum virksemi átti at steðga strembanini eftir at fáa eina fiskivinnu í Føroyum. Tá ið nevndin var liðug við arbeiði sítt, fylti fiskivinnan tí munandi meir, enn hon frammanundan hevði gjørt. Í øðrum punkti á skránni hjá nevndini sum fyrireiking til fríhandil í Føroyum skrivaði hon soleiðis:

> Næringsvejenes Udvidelse og Forbedring er ligeledes en Hovedbetingelse for Handelens Frigivelse. Fiskerierne, hvoraf Fremmede nu høste Fordeel, bør her især komme i betragtning. Allerede Forordningen af 15. Aug. 1790, § 17, tilsagde Indbyggerne Understøttelse til Fiskeries Drift i det Store og en bedre Virkningsmaades Indførsel. Men Tilsagnet var ubestemt, og virkede nok kun lidet. De færøske Fiskevarer ere ogsaa saa gode, at de søges endog

fremfor de islandske. At forhjælpe Indbyggerne til at anskaffe sig Dæksfartøier er derimod vigtigt. De kunde da søge de bedre Fiskerie ude til Havs; de bleve bedre forvante og skikkede til, naar Handelen frigives at føre den med egne Skibe; ogsaa kunde de bruge slige Fartøier til Transporten imellem Øerne, især af Stenkul fra Suderøe. For Muligheden af, at Snighandel derved kunde opstaae, synes et saa vigtigt Foretagende ikke at burde opgives. Eet Dæksfartøi have Indbyggerne paa Nolsøe allerede under Opbygning, men uden Understøttelse vil Sagen dog næppe komme ret i Gang. Commissionen foreslaaer derfor, at en Præmie maatte udloves af 25 Rbs. Sølv pr. Commerselæst for Opbyggelsen af Dæksfartøier fra 3 til 15 Læster, hvilke ere bedst skikkede til Farten imellem og Fiskeriet omkring Øerne, samt 30 Rbs. Pr. Commerselæst for Fartøier over 15 Læsters Drægtighed, hvilke ogsaa kunde gaae til andre Lande. Præmien kunde udloves for det første paa 3 Aar, fra 1822 at regne. For Skibe fra 3 til 15 Commerselæster, hvilke af Indbyggerne maatte blive kjøbte og som altsaa ikke deltage i opbyggelse-Præmien, foreslaaes den ved Forordningen af 13. Marts 1812, § 1, paabudne Afgift eftergiven, ligesom er bevilget for Skibe, der fra Udlandet kjøbes til Fiskerie og den indre Samfærdsel i Island. Ligeledes indstilles, at Indbyggerne derhos maatte gives Haab om en eller anden benaadning, naar de i det mindste i eet Aar havde brugt saadanne kjøbte Fartøjer til Fiskerie og Transporter[63].

Høvuðsgrundgevingin fyri, at fiskivinna nú var týdningarmiklasta amboðið at fyrireika landið til fríhandil, var, at útlendingar vóru farnir at fiska í føroyskum sjógvi, og helst eru tað teir, sum hugsað verður um, tá ið sagt verður, at føroyski fiskurin er betri enn tann íslendski. Tí átti stuðul at gevast til deksfør, sum kundu fiska úti á havinum, og samstundis gjørdu hesi skip eisini, at føroyingar gjørdust førir fyri at flyta farm millum oyggjarnar. Nevndin helt, at skipabygging skuldi stuðlast á sama hátt sum í Íslandi, og hon helt eisini, at føroyingar skuldu kunna rokna við at fáa eyka stuðul, um teir í eitt ár høvdu nýtt skip til fiskarí ella flutning.

Fáar dagar, áðrenn kunngerðin frá 21. september 1821 varð kunngjørd, sendi Fríðrikur 6. kongur bræv til Løbner amtmann, sum vísti, at hann hevði stóran áhuga fyri einari møguligari fiskivinnu í Føroyum. Tað var eisini Fríðrikur, tá sum krúnprinsur, sum tók so væl ímóti Nólsoyar Pálli og hinum sendimonnunum í Kiel í 1807, og tí er tað møguligt, at áhugi hansara fyri føroyskari fiskivinnu var gamal. Ein annar uppruni til áhugan hjá kongi, kann vera royndirnar, sum kongur hevði av teimum fiskiroyndunum, sum vóru settar í verk í Íslandi, tá ið kongur tók við einahandlinum í 1776 (Nolsøe og Jespersen 2009: 260). Kongur bað Løbner skriva sær eitt álit um fiskiveiðuna kring Føroyar, og hann vildi

63 SA. Rentukamarið. Diverse breve og dokumenter vedr. Færøerne og den færøske handel (1682-1847). Álitið frá nevndini at viðgera spurningin um føroyska handilin er í „Extract af Commissions-Forestillingen af 14de Julii 1821, angaaende den færøske Handels bedre Indretning m.v.“

eisini hava hann at svara, um tað mundi fara at loysa seg líka væl at fiska við deksførum kring Føroyar, sum tað hevði gjørt í Íslandi. Harumframt setti hann fýra ítøkiligar spurningar um fiskileiðir, viljan og evnini at reka deksfør, hvør bátastødd var tann besta, og um útróðrarbátar kundu fingið dekk ísett (Nolsøe og Jespersen 2009: 255).

Løbner svaraði 3. juni 1822 spurningunum, og hann vísti m.a. á, at fiskur frá deksførum mátti virkast til saltfisk, men í handlinum var prísurin fyri eina tunnu av saltfiski bara 10 ríkisdálar. Tá ið tunnan kostaði 4 ríkisdálar 2 skillingar, og saltið til tunnuna kostaði 2 ríkisdálar og 33 skillingar, vóru bara 3 ríkisdálar og 33 skillingar eftir, sum allar aðrar útreiðslur til útgerð, vistir og annað skuldi gjaldast av. Prísurin var tí ein forðing fyri menning tann vegin (Nolsøe og Jespersen 2009: 257). Løbner helt 7 lestir sjaluppir vera hóskandi til fiskiskap undir Føroyum, soleiðis sum kongur hevði skotið upp, og at neyðug útgerð var ein ella tvær línur við húkum, tí tær vóru skjótar at seta og forðaðu ikki fiskiskapinum við snøri. Hann helt eisini, at rætt var at hava tvær hákellingalínur hangandi, tí tær forðaðu als ikki toskafiskiskapinum og kundu geva so nógv av sær, sum ongin tordi at ímynda sær.

Seinni í samskiftinum segði Løbner eisini, at fiskurin í Føroyum ikki kundi turkast til klippfisk, tí luftin var vanliga vát og slavin, og harumframt var turrur fiskur betri handilsvøra enn klippfiskur (Nolsøe og Jespersen 2009: 259). Tí helt hann samanumtikið, at landbúnaður framvegis skuldi vera høvuðslívsgrundarlagið í Føroyum, og útróður og fiskivinna við deksførum kundu so stuðla landbúnaðinum. Í *Havnar søga*, har longri frágreiðing er um hetta áhugaverda samskiftið, halda rithøvundarnir, at tað var henda niðurstøða, sum gjørdi, at fiskivinna ikki varð ment tá, men eini 20-25 ár seinni (Nolsøe og Jespersen 2009: 260). Løbner endaði álitið til kongs við at skjóta upp, at eitt deksfar varð smíðað, sum bæði kundi nýtast til fiskiskap og til embætisferðir amtmansins. (Nolsøe og Jespersen 2009: 259) Hetta varð til skonnartina „Thorshavn", sum vit venda aftur til seinni.

Tað er torført at finna út av, hvørja støðu Løbner veruliga hevði til eina framtíðar fiskivinnu. Hann var harðliga ímóti Nólsoyar Pálli, og hann var, so skjótt sum kríggið endaði, óttafullur um ætlanina við nólsoyarskipinum „Jubelfesten". Síðani skeyt hann sjálvur upp, at fiskivinna varð ment sum fyrireiking til at avtaka Einahandilin, men stutt eftir boðar hann sum amtmaður sjálvum kongi frá, at fiskivinnan í mesta lagi kann gerast ein stuðul hjá landbúnaðinum og sostatt ikki kundi gerast eitt amboð, sum kundi kollvelta gamla samfelagið. Hugsandi er, at tað var ørkymlandi fyri miðfyrisitingina í Keypmannahavn, at amtmaður teirra í Føroyum var so ógreiður í síni støðutakan til henda fyri framtíðar menning av føroyska samfelagnum so týdningarmikla spurning.

Boðini um, at fiskiskip kundu fáa stuðul frá tí almenna, gjørdu helst sítt til, at nakrir einstaklingar fingu hug at royna seg við skipsfiskiskapi og farmavinnu. Ein teirra var Suðuroyar-Dánjal, sum hevði ført skonnartina „Færøe", til hon varð seld til Danmarkar. Hann var staddur í Keypmannahavn á heysti 1821,



*Suðuroyar-Dánjal keypti 9. november 1821 skonnartina „Karen Margrethe“. Hann royndi at fiska við henni várið eftir, men fekk tað ikki at bera til.*
*(Mynd: Tjóðsavnið)*

og sjálvt um tað ikki verður nevnt, er nærliggjandi at halda, at hann frætti um hugin hjá statinum at stuðla føroyskum deksførum. Í hvussu er keypti hann 9. november sama ár skonnartina „Karen Margrethe“, sum var 24 tons stór. Í Keypmannahavn fekk hann nakað av farmi at føra fyri handilin, so nú var í hvussu er handilin meira stuðlandi, enn hann hevði verið.

Ætlanin við skipinum var at royna fiskiskap undir Føroyum, og 21. apríl 1822 fór Dánjal saman við seks øðrum monnum at royna fiskieydnuna. Teir royndu at finna ein banka 64 fjórðingar í ein útsynning úr Suðuroynni, sum tað segðist, at hollendingar høvdu brúkt nógv í farnum tíðum. Tað eydnaðist at finna bankan, men fiskiskapurin var lítil, tí skipið hevði bara fingið 50 toskar, tá ið teir fóru til lands aftur eftir at hava fiskað í 3 vikur. Á veg inn á Vág fekk skipið stóran skaða, men Dánjal umvældi tað og gjørdi enn eina fiskiroynd. Hon var líka miseydnað sum tann fyrra, og tí varð avgjørt at fara til Keypmannahavnar aftur við skonnartini og selja hana har. So langt kom „Karen Margrethe“ kortini ikki, tí skipið sakk á Havnarvág 7. juli 1822 (Nolsøe 1984: 188–189).

Ein annar, sum sá møguleikar í stuðulinum, sum staturin vildi lata føroyskum skipum, var Jóhan Hendrik Weyhe, ið hevði siglt við Einahandilsins skipum og fingið sær stýrimansprógv, og sum harumframt var kongsbóndi í Søldarfirði. Hann fekk saman við øðrum savnað 1000 ríkisdálar saman, sum ein av skiparunum á skipunum hjá kongliga handlinum fekk at keypa eitt skip fyri. Henda royndin at

keypa skip miseydnaðist, og tá skiparin doyði stutt eftir, mistu teir allan peningin (Nolsøe 1984: 194).

Jóhan Hendrik gavst kortini ikki við skipaætlanunum sínum. Hann keypti ein gamlan bát av einum skipi, sum var strandað undir Føroyum. Báturin varð útbygdur og gjørdist ein sjalupp á uml. 10 tons. Við navninum „Forsøget“ er lítið at ivast í, hvat endamálið var við sjaluppini. Jóhan Hendrik fiskaði við „Forsøget“ í 1824, men úrslitið var vánaligt, tí alt endaði við einum tapi upp á 2000 ríkisdálar. Ógreitt er, hví tað gekst so illa, men helst var tað ein samanrenning av fleiri umstøðum, so sum at skipið var ov lítið, ov lítið av fiski var at fáa, og ov lítil prísur fekst fyri fiskin (Nolsøe 1984: 195). Prísurin á einari tunnu av saltaðum toski var farin úr 10 ríkisdálum í 1822 niður í 6 ríkisdálar í 1823 (Nolsøe og Jespersen 2009: 239), so helst kom Jóhan Hendrik at merkja, at meðan tað almenna við einari hond lovaði at stuðla bygging og keypi av fiskiskipum, tók tað við hinari hondini grundarlagið undir slíkari vinnu við at lækka prísin við 40 prosentum.

At stuðulin til at byggja upp eina fiskivinnu í Føroyum ikki hevði líka stóra undirtøku alla staðni í almennu skipanini, merkti Jóhan Hendrik eisini, tá ið hann eftir miseydnaðu royndirnar at fiska í 1824 søkti um at fáa tann stuðul, sum varð lovaður í kunngerðini frá 21. september 1821. Tá ið Løbner amtmaður skuldi ummæla hesa umsókn, mælti hann í brævi til Rentukamarið 14. mai 1825 frá at lata Jóhan Hendriki stuðulin, tí báturin var so vánaligur, at hann ivaðist í, um nakar tordi at fara við honum. Amtmaðurin visti heldur einki um, at Jóhan Hendrik hevði „indbragt det mindste ved sit Fiskeri“. Rentukamarið fylgdi tilmælinum hjá amtmanninum, men tá hevði Jóhan Hendrik longu verið í Keypmannahavn og selt skipið (Nolsøe 1984: 196).

Í Keypmannahavn keypti Jóhan Hendrik eina nýggja slupp, sum æt „Caroline“ og var 16½ kommersulest. Bæði á niðurferðini við „Forsøget“ og heimferðini við „Caroline“ ansaði amtmaðurin væl eftir, at eingin vøra var við skipunum. Fútin skuldi tryggja sær, at bara barlast var umborð, tá ið „Forsøget“ fór av Havnini, og áðrenn Jóhan Hendrik kom heim við „Caroline“, fekk sorinskrivarin greið boð um at koyra Jóhan Hendrik í Skansan, um „han i mindste Maade er nogen af Deres Befalinger overhørig“. Jóhan Hendrik kom á Funning 13. desember 1925, og C.L. Tillisch, sum tá hevði avloyst Løbner sum amtmann, fór sjálvur norður at tryggja sær, at eingin ólóglig vøra kom í land. Tá ið hann kom fram, var eingin vøra at finna í skipinum, men við at hótta Jóhan Hendrik, noyddist hann at viðganga, at teir høvdu havt ymiska vøru við, sum var fjald í haganum, og hann viðgekk eisini, at teir høvdu havt 660 troyggjur og nøkur hosupør við sær til Danmarkar. Nú kundi roknast við, at Jóhan Hendrik fór at fáa harðan dóm, men tíbetur fyri hann skilti nýggi amtmaðurin betur hugin at bøta um korini í Føroyum, enn Løbner hevði gjørt, og nýggi amtmaðurin royndi í skrivi til Rentukamarið 12. mai 1826 at verja Jóhan Hendrik og stýrimann hansara. Hann vildi tí hava, at teir fingu innkeypsprísin fyri vørurnar aftur, og annars



*Søgan um skipini hjá Jóhan Hendriki Weyhe er í fleiri førum meinlík søguni um Nólsoyar Páll og „Royndina Fríðu“, men nýggi amtmaðurin, Christian Ludvig Tillisch, var ikki so íðin at revsa Jóhan Hendrik, sum Løbner hevði verið at revsa Nólsoyar Páll.*
*(Mynd: Tjóðsavnið 8779F106)*

sluppu undan nakrari revsing. Hesum tók Rentukamarið undir við (Nolsøe 1984: 196–199).

Hvussu gekst víðari við fiskiroyndunum hjá „Caroline“, vita vit einki um, annað enn at hann fekk loyvi til at fiska 7. juli 1826. Páll J. Nolsøe roknar í *Siglingarsøguni* við, at tað gekst teimum illa, tí „Carolina“ endaði við at verða uppdrigin í Skálabotni onkustaðni og kom at liggja har í nøkur ár. Jóhan Hendrik upplivdi hesa tíðina nakað tað sama, sum Nólsoyar Páll á sinni hevði upplivað. Ónøgdin var stór við handilstakstirnar, sum serliga í 1827 hækkaðu nógv, og tí fekk hann fleiri áheitanir um at gera nakað við tað. Jóhan Hendrik fekk nakrar eiðismenn at seta saman eitt skriv, sum skuldi ganga runt í Eysturoy og seinni í hinum oyggjunum. Í brævinum var ein áheitan um at stuðla trimum monnum í at fara til Danmarkar við „Caroline“. Har skuldu teir fara til kong og greiða honum frá, at fólkið vildi hava lægri takstprísir og loyvi at sigla við egnum skipum fyri handilin. Um hetta ikki varð gingið á møti, skuldu teir krevja at fáa frían handil. Jóhan Hendrik skuldi vera formaður á ferðini. Í Eysturoynni fekk áheitanin góða undirtøku, og sýslumaðurin í Norðoyggjum væntaði ikki, at undirtøkan har fór at verða lakari, men hann kundi sum sýslumaður sjálvandi ikki bera áheitanina víðari. Úr hinum sýslunum var einki svar komið, tá ið myndugleikarnir komu uppí (Nolsøe 1984: 200–201).

Tá ið amtmaðurin hoyrdi um skrivið, gjørdi hann skjótt av og setti Jóhan Hendrik í fongsul. Hann og teir tríggir, sum høvdu skrivað brævið, komu fyri rættin, men tá ið teir høvdu viðgingið, at hetta var íkomið av teirra „Ufornuft og Vildfarelse", sluppu teir við at biðja um fyrigeving (Nolsøe 1984: 201).

Meira hendi ikki við fiskiskipaætlanunum hjá Jóhan Hendriki Weyhe. Prógv var enn einaferð fingið uppá, at trýst varð lagt á einahandilsskipanina, um fólk fingu egin skip, bæði tí at tað kundi elva til ólógligan handil, og tí at leiðin tá var tað styttri at fara til kongs og biðja um at fáa skipanina broytta. Tað vóru embætismenn í Føroyum ikki fyrireikaðir uppá, og Rentukamarið tók undir við teirra sjónarmiði. Tí kundi lítið og einki koma burtur úr góðu ætlanunum hjá nevndini, sum í 1821 viðgjørdi handilin í Føroyum. Tvørturímóti vóru báðar royndirnar at reka fiskivinnu endaðar við stórum tapi, og úrslitið varð, at tær gjørdust „afskrækkende Exempler for lang Tid", sum Muhle bókhaldari við Føroyahandilin í Keypmannahavn tók til í 1835 (Muhle 1970b: 10).

Søgan um Suðuroyar-Dánjal og Jóhan Hendrik Weyhe tykist prógva niðurstøðuna hjá Muhle um, at „Opmuntring til Dæksfartøiers Anskaffelse vil sandsynligt stedse mangle, saalænge Handels-Monopolet skal vedvare." (Muhle 1970b: 10) Samstundis vísa royndirnar hjá Jóhan Hendriki Weyhe eisini, at kapitalgrundarlagið í Føroyum var ov veikt til at byggja upp eina fiskivinnu. Sjálvt um hann var ein av teimum bóndunum, sum vóru frægast fyri peningaliga, so noyddist hann at fáa fleiri av sínum javnlíkum at stuðla sær í skipaætlanunum, men kortini rakk tað ikki longur enn til skip, sum vóru hildin at vera ov vánalig til fiskiskap. Tað var ikki bara vilji, sum skortaði. Evnini skortaðu eisini, sjálvt hjá monnum, sum bæði høvdu stýrimansútbúgving og gott fíggjarligt grundarlag í stórum kongsgarði. Skuldi støðan broytast, máttu almennu embætismenninir broyta hugburð. Tann broytingin nærkaðist í hvørjum, og tað sást millum annað aftur í, hvussu nógv linari nýggi amtmaðurin var í revsingini av Jóhan Hendriki Weyhe, í mun til hvussu undanfarni amtmaðurin var farin við Nólsoyar Pálli.

Í samskifti sínum við kong um møguleikarnar fyri einari fiskivinnu í Føroyum, skeyt Løbner amtmaður í 1822 upp, at kongur bygdi eitt deksfar til fiskiskap, sum eisini kundi nýtast til embætisferðir kring landið og verða sjófarandi til hjálpar sum loðsbátur (Nolsøe og Jespersen 2009: 259). Kongur fylgdi hesum tilmælinum, og tók stig til at byggja eina 13 tons stóra slupp, sum var liðug í september 1824. Sluppin fekk navnið „Thorshavn" (Nolsøe 1984: 207).

Óneyðugt er at gjøgnumganga søguna um hesa sluppina hjá almennu myndugleikunum í hesi ritgerðini, tí hon er neyvt lýst í *Siglingarsøguni* (Nolsøe 1984: 206–228) og í *Havnar søgu* (Nolsøe og Jespersen 2009: 261–266). Tað áhugaverda er, at hóast sluppin upprunaliga kom í eygað orsakað av ynskinum um at gera royndarfiskiskap, so varð hon ikki nýtt til tað, tá ið hon kom til Føroya. Tá var endamálið at gera embætisferðir og at virka sum verjuskip at ansa eftir, at eingin loynihandil fór fram í sambandi við fremmandu fiskiførini. Við øðrum orðum fór endamálið frá at vera fiskiskapur til at ansa eftir tí sama loynihandlinum, sum

embætismenn óttaðust so nógv fyri, at teir helst ikki vildu hava skip í Føroyum. Hetta er sostatt enn eitt gott dømi um, at samsvar ikki var millum hugsanirnar um fiskiskap ovast í almennu fyrisitingini og hugsanina hjá embætismonnum í Føroyum. Framburðshugurin hjá kongi umskapaðist á leiðini niður gjøgnum almenna embætisverkið til verju av Einahandlinum og verandi samfelagsskipan.

## *5.10 Bátsbandið*

Áðrenn vit kunnu sleppa spurninginum um fiskivinnu í Føroyum áðrenn 1830 heilt, er neyðugt at hyggja at spurninginum um bátsbandið, og hvørja ávirkan tað hevði, tí tað hevur so ofta verið sagt, at tað var bátsbandið, sum forðaði fyri menningini av einari føroyskari fiskivinnu.

Útróðurin var í bóndasamfelagnum tætt knýttur at landbúnaðinum, og menn fóru bara til útróðrar, tá ið arbeiðið á landi loyvdi tí. Í einum av brøvunum, sum føroyingar sendu til kong um skotsku fiskiskipini tíðliga í 17. øld, klagaðu teir um, at skipini „sejler og ror igennem landet", og henda orðingin hevur saman við øðrum verið nýtt sum grundgeving fyri, at føroyingar roknaðu fiskileiðirnar sum „extensions of the land" (Wylie 1987: 30). So tætt var sambandið millum havið og jørðina, at fleiri dømi eru um, at bygdir hildu seg eiga leiðirnar uttan fyri sín haga, og tað var illa dámt, um fremmandir komu at royna har (Petersen 1968: 97).

Hetta var helst grundarlagið undir teirri lógini, sum við siðvenju varð ment til at skipa bátahald og manning av bátum í markatalsbygdunum, soleiðis at tann vanlukkuliga støðan ongantíð skuldi kunna koma, at menn í bygdini ikki sluppu til útróðrar. Siðvenjan varð skapt í einum støðugum samfelag við smáum og fáum broytingum, og tí passaði hon ikki so væl til, tá ið samfelagsligar rembingar fóru at følast í lokalsamfelagnum. Sambært siðvenjuni høvdu bøndur skyldu at halda ein part í báti, sum svaraði til jørðina, hann hevði, og allir menn í bygdini høvdu rætt til ein sess í bátunum.

Fleiri dømi eru um bátsbandamál í tingbókunum, men tað var ikki fyrr enn í 1813, at almennir myndugleikar fyrstu ferð komu uppí við nýggjum reglum. Tá varð í plakat frá 23. mars ásett, at mál av hesum slag kundu avgreiðast av sýslumanninum sum politimál, og um partarnir vildu kæra, kundu teir kæra til amtmannin, sum tók endaligu avgerðina (Degn 1929: 6).

Anton Degn helt, at orsøkin til, at henda ásetingin kom, var, at so nógv mál vóru um bátsband og bátshald árini frammanundan, og orsøkin til tað vóru hungursárini, meðan Danmark var við í Napoleonskríggjunum 1807 til 1814, og eitt vaksandi fólkatal. Tað gjørdi, at tørvurin á mati úr sjónum øktist, serliga hjá teimum, sum ikki høvdu so nógva jørð at liva av, samstundis sum fleiri menn vóru um teir somu sessirnar á fyrndarbátunum. Tí tóku menn seg saman

at byggja nýggjar smærri bátar, og tá komu teir at vanta í á fyrndarbátunum (Degn 1929: 9).

Trýstið á bátsbandaskipanina hesa tíðina var tí orsakað av einari kreppustøðu, og tá ið viðurskiftini við handilssambandinum til Danmarkar kom aftur í rættlag eftir 1814, gjørdist trýstið á skipanina eisini minni. Í politiprotokollunum hjá sýslumonnunum eru nógvar bátsbandasakir at finna millum 1813 og 1865, men enn hevur eingin gjørt eina gjølliga kanning av teimum. Ein slík kanning hevði verið sera áhugaverd á so mangan hátt, og hon hevði helst eisini kunna komið spurninginum nærri um, nær bátsbandaskipanin gjørdist eitt haft um beinini á teimum, sum vildu royna nýggjar leiðir.

Ein leystlig gjøgnumgongd av politiprotokollunum fyri Eysturoyar sýslu vísir, at flestu málini komu í av tí, at ein bátur var ov lítið ella ov nógv, og tí var torført at fáa talið á útróðrarførum monnum í bygdini at samsvara við talið á sessum í bátunum. Sýslumansins uppgáva var tí fyrst og fremst at fáa áttatabellina at ganga upp. Harumframt vóru fleiri sakir um arvarætt til bátssessir, og fleiri dømi eru eisini um persónligar tvístøður, sum gjørdu, at ávísir menn ikki vildu rógva út við hvørjum øðrum longur. Einstøk dømi eru eisini um menn, sum vildu sleppa av báti, tí bátsformaðurin legði ov nógv fyri, og tí tordu teir ikki at rógva við hesum bátsformanninum longur. Fyrstu nógvu árini sæst hinvegin einki til, at nøkur tvístøða kom í, tí at nakrir menn vilja gera meira við útróðurin, enn bøndurnir, sum áttu gomlu bátarnar, men tá ið komið var nakað út í 1840-árini komu mál av hesum slag fyri í bygdum, sum lógu væl fyri til útróður.[64]

Tí ber illa til at siga, at politiprotokollin fyri Eysturoy prógvar, at bátsbandið forðaði fyri menning av einari fiskivinnu. Bátsbandið hóskaði væl til gomlu samfelagsskipanina, og tað var ikki fyrr enn skipanin var broytt, at bátsbandið fór at kennast sum eitt haft. Tí verður bátsbandið sjáldan tikið upp á tungu í teimum mongu skjølunum um at menna fiskivinnuna, sum verða viðgjørd í hesi ritgerðini. Ein nærri kanning av gongdini fram móti avtøkuni av bátsbandinum í 1865 prógvar eisini, at tað var eitt broytt samfelag, sum var orsøk til ynskið um hesa avtøku. Tí verður málið um avtøkuna av bátsbandinum heldur eitt prógv um, at samfelagið var broytt, enn at bátsbandið var ein forðing fyri, at henda broytingin kundi henda.

## *5.11 Samandráttur*

Í hesum kapitlinum hava vit sæð, at tað er ógreitt, hví ull avloysti fisk sum høvuðsútflutningsvøra tíðliga í 17. øld. Hinvegin er greitt, at handilin um somu tíð gjørdist partur av merkantilistiska virkseminum hjá Kristiani 4., og tað er mest sannlíkt, at hesar báðar broytingarnar hava samband hvør við aðra. Gongdin í 17. øld hevði við sær, at føroyingar vóru ógvuliga trekir at gera meira burtur úr

64 Politiprotokol fyri Eysturoynna 1816-1833 og Politiprotokol fyri Eysturoynna 1833-1847.

fiskivinnuni, enn brúk var fyri til matna heima við hús, og tað merkti Fríðrikur Gabel, tá ið hann gramdi seg um vánaligu møguleikarnar at sleppa av við hosur og spurdi, hví føroyingar ikki fiskaðu longur. Gabel gjørdi nakrar fiskiroyndir við einum av skipum sínum, og tað tykist greitt, at ætlanir eisini vóru um at menna fiskivinnu, tá ið kongur yvirtók Einahandilin í 1709. Tær gjørdust ongantíð veruleiki, og mong ár gingu, áðrenn fiskivinnan aftur kom upp á tal.

Teir báðir Hans Jákupson Debes og Jens Christian Svabo vóru ávirkaðir av upplýsingarhugsjónini og gjørdu sær hugsanir um, hvussu landið kundi mennast búskaparliga. Debes hevði onkur hugskot til, hvussu føroyingar kundu eggjast til at fara undir at framleiða saltfisk, men handilsforvaltarin Lund trúði lítið upp á eina fiskivinnu og helt, at tað var „det Alviise Forsyn“, at eingin fiskivinna skuldi vera í Føroyum. Í hesum kjaki kom greitt til sjóndar, at samsvar ikki var millum framburðsstevnuna hjá upplýsingarmonnum og Einahandilin.

Svabo helt, at tað var jarðarbrúkið, sum skuldi verða grundarlagið undir búskaparligum framburði í Føroyum. Fiskivinnan var í hansara hugaheimi bara triðja vinnan, og hann tók í hvussu er partvíst støði í teirri somu gomlu fatanini av gagnnýtslu av náttúruni, sum føroyingar høvdu. Teir vóru bangnir fyri, at um ov nógv varð fiskað, fór fiskurin at hvørva. Born kommandantur, sum hvørki var bundin at Einahandlinum ella gamla føroyska samfelagnum, hevði eina heilt aðra náttúrufatan og helt, at tað ráddi um at fiska so nógv, sum til bar, tá ið fiskur var at fáa. Born hevði fleiri hugskot til, hvussu fiskivinna kundi mennast, og hann var eisini limur í nevndini, sum í 1790 kom við einari nýggjari reglugerð fyri føroyska handilin. Tí er sannlíkt, at hansara hugsanir vóru við til at gera, at reglugerðin læt upp fyri møguleikanum at stuðla fiskivinnuætlanum.

Einki sæst sostatt til, at almennir myndugleikar vóru ímóti at fáa gongd á fiskivinnu í Føroyum, men tann støðan broyttist, tá ið einstaklingar við royndum á sjónum, sum t.d. skiparar, fóru undir at gera veruligar royndir. Søgurnar hjá bæði Nólsoyar Págli og Jóhan Hendriki Weyhe vísa, at eitt fiskiskip ikki bara kundi brúkast til at fiska við. Skipið gav eisini reiðarunum ein mobilitet, sum vísti seg at vera vandamikil fyri galdandi skipan. Í fyrstu syftu, tí skipini kundu taka kappingina upp móti Einahandlinum við at bróta lógina eitt lítið sindur, og í øðrum lagi tí tíðindi og hugsanir komu út millum fólk, sum so kundu velja sær umboðsmenn at fara av landinum at greiða frá veruligu støðuni og royna at vinna sær stuðul longri uppi í skipanini. Hetta gjørdi, at bæði embætismenn og einahandilsmenn føldu seg hóttar, og tí mæltu teir til at fara harðliga til verka at steðga slíkum monnum. Tað samsvarar væl við leiklutin hjá veika statsvaldinum í javnvágsfelluni.

Leikluturin hjá nýggja amtmanninum, tí unga løgfrøðinginum C.L. Tillisch, í málinum móti Jóhan Hendrik Weyhe, gav eina ábending um, at Føroyar høvdu fingið ein ovasta almennan myndugleika við einum øðrvísi hugsunarhátti, enn gomlu embætismenninir høvdu havt. Staturin var nú so mikið væl mentur, at ongin orsøk var at avbyrgja landið meira. Staturin hevði ikki brúk fyri javnvágsfelluni

longur og kundi við fullari megi fara undir at modernisera henda partin av ríkinum. Javnvágsfellan var viknandi, og tá fór at gerast pláss fyri einari kreativari niðurbróting av gamla bóndasamfelagum, sum forðaði fyri so mongum lutum í moderniseringini. Fiskivinnan var týðandi lutur bæði í niðurbrótingini av ekstraktiva bóndasamfelagnum og rásini fram ímóti einum meira inklusivum samfelag.

# 6. kapittul
# *Hetland – ekstraktivt feudalsamfelag við stórari fiskivinnu*

Í Hetlandi hevur fiskivinnan altíð havt stóran týdning, og Hetland varð fleiri ferðir nevnt sum fyrimynd, tá ið roynt varð at menna eina føroyska fiskivinnu. Born kommandantur setti longu umleið 1790 spurningin, hvussu tað bar til, at fólkatalið í Hetlandi var fýra ferðir so stórt, sum tað var í Føroyum, tá ið oyggjarnar í støðd og landafrøðiliga annars líktust so nógv. Júst sami spurningur elvdi seinni til, at Pløyen amtmaður tók stig til eina kanningarferð til Hetlands at vita, hvat føroyingar kundu læra av hetlendingum. Henda ferðin, sum meira verður gjørt burtur úr seinni, fekk avgerandi týdning í menningini av fiskivinnuni og harvið í at fáa føroyingar burtur úr ekstraktiva bóndasamfelagum og inn í eitt meira inklusivt fiskivinnusamfelag við heilt øðrvísi vakstrarmøguleikum. Tað løgna er, at sjálvt um menningin av Hetlandi og hetlendskari fiskivinnu gjørdist fyrimynd, so var henda menningin hend í einari ekstraktivari skipan, og hetlendski búskapurin var longu í stórum trupulleikum, tá ið Pløyen og ferðafelagar hansara vitjaðu har í 1839, og tað kom til sjóndar beint eftir ferðina.

## *6.1 Skotskir lairdar yvirtaka Hetland*

Eins og í Føroyum var fiskur í Hetlandi ein týdningarmikil partur av lívsgrundarlagnum frá byrjan av. Londini eru ikki uppløgd landbúnaðarlond, men fiskigrunnarnir kring oyggjarnar eru góðir, og nógv bendir á, at útróður í Føroyum og Hetlandi frá landnámstíðini av hevur verið rikin á nøkulunda sama hátt (Goodlad 1971: 58).

Eisini á handilsøkinum tykjast Føroyar og Hetland at hava nógv til felags í miðøld, tá ið handilin serliga fór umvegis Bergen. Á tann hátt gjørdist hetlendski handilin partur av handlinum hjá hansakeypmonnum, og tá ið Hetland varð latið í veð fyri brúðarpening í 1469, og hansakeypmenn í 16. øld ikki vóru líka miðsavnaðir kring handilsstøð sum Bergen, settu týskir handilsmenn seg niður í Hetlandi um summarið at selja hetlendingum vøru aftur fyri fisk (Goodlad 1971: 69). Týsku handilsmenninir keyptu fiskin og virkaðu hann sjálvir. (Smith 1986: 57) Á henda hátt fingu hetlendingar pening um hendi og „a surplus above subsistence level“ (Goodlad 1971: 71).

Síðst í 16. øld fóru hollendingar eisini at fiska sild við Hetland í stórum stíli, og hetlendingar handlaðu nógv við hollendsku sildaskipini uttan um góðseigararnar.

Tað gav eisini hetlendingum eitt sindur av vørum ella peningi, men tá ið altjóða ósemjur síðst í 17. øld gjørdu, at sildafiskaríið minkaði, merktist tað sum ein stór lækking í livistandardi hjá bóndunum (Smith 1986: 55).

Um aldaskiftið 1700 vóru gomlu familjurnar við nógvari jørð í stórum búskaparligum trupulleikum, og endin varð, at nýggjar ofta skotskar ættir keyptu jarðarognirnar, og tær ættirnar løgdu seg meira eftir at stýra øllum búskapinum. Í 1707, tá ið Skotland varð lagt saman við Onglandi, komu enskar siglingarlógir at galda í Hetlandi, og í 1712 varð skattur lagdur á innflutt salt, og tað gjørdi enda á vinnuni hjá týsku keypmonnunum (Smith 1986: 60). Ofta hevur verið róð framundir, at nýggju góðseigararnir, ella lairdarnir, høvdu ein fingur við í spælinum at fáa tað almenna at seta lógir í verk, sum gjørdu enda á týsku vinnuni, men tað er ikki prógvað. Úrslitið var í øllum førum, at onkur mátti yvirtaka tann leiklutin, sum týsku keypmenninir høvdu havt í hetlendska búskapinum, og tað vóru bara lairdarnir, sum vóru førir fyri tí (Smith 1986: 61).

Jarðarviðurskiftini í Hetlandi líktust upprunaliga nógv teimum í Føroyum við nógvum óðalsbóndum og so væl av kongsjørð. Í grein um elsta varðveitta skjalið í Hetlandi, ið er dagfest í 1299, hevur Brian Smith víst á, at ósemjan, sum er umrødd í brævinum, var íkomin av, at ein nýggj skipan fyri, hvussu skattur varð goldin av jørð, stutt frammanundan var sett í gildi. Henda nýggja skipanin hevði avloyst gomlu skipanina, sum bygdi upp á siðvenju hjá orknoyajallum, og hon hevði til endamáls at vinna Hákuni hertúga inntøku (Smith 2011). Hákun hertúgi fekk inntøku úr bæði Hetlandi og Føroyum, sum hoyrdu til hansara hertúgadømi, og hugsandi er, at upprunin til Seyðabrævið eisini hevði samband við eina slíka nýggja jarðarmetingarskipan. Í hvussu er varð jørðin í Føroyum og Hetlandi gjørd upp í mørkum, og ognarviðurskiftini tykjast at líkast sera nógv komandi øldirnar.

Henda markatalsskipanin var galdandi langt aftan á, at Hetland í 1469 varð latið skotska konginum, tí Norska lóg var galdandi til 1611. Gjøgnum 16. og 17. øld komu gomlu óðalsbøndurnir undir størri og størri búskaparligt trýst, og teir mistu síni rættindi sum fríbøndur og noyddust at gerast uppsitarar hjá góðseigarunum. Síðst í 17. øld vóru óðalsbøndur sum sosialur bólkur so at siga horvnir, og góðseigarar sótu við valdinum á allari jørðini (Smith 1986: 48).

Tað vóru hesi góðsini, sum skotskar ættir yvirtóku um aldaskiftið 1700, og hesar nýggju ættirnar komu, eftir at týsku handilsmenninir vóru rýmdir, eftir stuttari tíð at stýra Hetlandi á øllum økjum. Tað gjørdi teir við at seta í verk eina skipan, sum verður nevnd „the Zetland Method". Hetta var ein menning av teirri skipanini, sum hetlendingar frammanundan høvdu nýtt í samhandlinum við týskarar (Smith 1986: 65).

Tá ið týsku keypmenninir hvurvu, hvarv eisini tað sambandið, sum bant hetlendska bóndan saman við evropeiska marknaðin. Tað gjørdi, at bøndurnir ikki sluppu av við sínar vørur, sum serliga vóru fiskavørur, samstundis sum møguleikin at keypa týdningarmikla innflutningsvøru hvarv. Umframt at hótta



*Fiskistøðir vóru í 18. øld mentar í Hetlandi at rógva út frá. Á myndini eru skúrarnir, har útróðrarmenn búðu í Stenness. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

tilverugrundarlagið hjá bóndunum gjørdi henda støðan eisini, at bøndurnir ongan pening høvdu til at gjalda góðseigarunum síni leigugjøld. Tí var henda støðan eisini ein hóttan móti vælferðini hjá góðseigarunum, og einasta loysnin hjá teimum var, at teir sjálvir átóku sær uppgávuna at virka sum handilsmenn (Goodlad 1971: 91).

Góðseigararnir mentu sín leiklut sum handilsmenn í fyrru helvt av 18. øld, og samstundis mentist sonevnda „Haf fishery", har bøndur nýttu summarið til at rógva út á havmið við seksmannaførum at seta línu. Til at røkja henda fiskiskapin so væl, sum til bar, vóru fiskistøðir mentar á støðum, sum lógu so tætt upp at fiskimiðunum, sum til bar. Á hesum fiskistøðunum búðu útróðrarmenninir, og meðan teir vóru úti, arbeiddu dreingir og gamlir menn fiskin til klippfisk á helluni (Goodlad 1971: 110). Alla hesa framleiddu vøruna fingu góðseigararnir, sum so kundu selja hana á altjóða marknaðum, og á tann hátt kundu bøndurnir gjalda síni leigugjøld við fiski.

Soleiðis mentist ein skipan, har bøndurnir ongan annan møguleika høvdu enn at virka jørðina fyri tann, sum átti hana, og tí kundi ein skipan mennast, har bøndurnir noyddust at fiska fyri góðseigaran. Tá ið skipanin var ment, gjørdu vánalig ár til úrtøku úr bæði jørðini og havinum, at bøndurnir komu í skuld til góðseigararnar, sum teir høvdu lítlar vónir um at koma burtur úr aftur. Teir vóru blivnir trælir hjá góðseigarunum (Smith 1986: 45).

Henda skipanin minnir um jarðarskipanina í Føroyum um somu tíð, har kongur sat við helvtini av jørðini og samstundis eisini hevði einarætt til allan handil. Munurin var, at kongur ikki í líka stóran mun eyðrændi sínar bøndur,

sum góðseigararnir í Hetlandi gjørdu. Hetlendska jarðarskipanin var við øðrum orðum meira ekstraktiv enn tann føroyska

## *6.2 Royna at koma burtur frá Zetland Method*

Móti endanum á 18. øld, ella um somu tíð sum spurnartekin varð sett við Einahandilin í Føroyum, ásannaðu fleiri, at henda „Zetland Method" var ein forðing fyri allari búskaparligari menning og fyri persónligum frælsi (Smith 1986: 68). Ein orsøk til hesa ásannan var helst tann búskaparliga kreppan, Hetland kom í hesa tíðini. Kreppan hevði tvær orsøkir. Onnur var minkandi fiskiskapur, og hin var ein malthusisk kreppa, tí fólkatalið fór upp um tað, sum landbúnaðurin megnaði at føða.

Orsøkin til malthusisku kreppuna var í hvussu er partvíst, at góðseigarar í eini roynd at økja um inntøkur sínar eggjaðu fólki at gifta seg í ungum aldri og samstundis býttu garðar sínar sundur, so teir gjørdust minni og minni (Smith 1986: 109). Meðan ekstraktiva feudalskipanin í Føroyum hesa tíðina royndi at avmarka vøksturin í fólkatalinum, var fólkatalsvøkstur tí ein fyrimunur fyri góðseigararnar í Hetlandi. Tað merkir, at tað stóra fólkatalið í Hetlandi, sum t.d. Born og Pløyen sóu sum tekin um ein búskap, sum var langt framman fyri tann føroyska, var grundað á somu ekstraktivu skipan, sum teir royndu at fáa føroyska samfelagið burturúr.

Í Hetlandi var tað greitt, at fiskivinnan ikki kundi mennast meira við verandi tøkni (Smith 1986: 113). Tað komst ikki longur fram á leið við skipanini hjá góðseigarunum, og tí skapti henda kreppan grundarlag fyri, at nýggir handilmenn kundu gera seg galdandi (Smith 1986: 106).

Um somu tíð fóru upplýsingarmenn at gera sær hugsanir um, hvussu the Highlands í Skotlandi og altso eisini Hetland kundi mennast. Teir hugsaðu um hesi øki sum óútviklaðar koloniir, og vanligasta hugsanin um, hvussu tey kundu mennast, var at økja um fiskivinnuna (Smith 1986: 69). Tað fekk eisini politiska undirtøku, og í 1785 var ein Parliamentary Committee stovnað at kanna, hvussu støðan var í bretsku fiskivinnuni. Í nevndararbeiðinum úttalaðu m.a. Hall og Hay og aðrir handilsmenn seg, og einstakir parlamentslimir vóru samdir við teirra hugsanum um framtíðina hjá Hetlandi, men enn var teirra tíð ikki komin (Smith 1986: 74).

Tríggir møguleikar vóru at koma burtur úr kreppuni. Ein var at økja um verandi framleiðslu, ein annar at fara undir nýggja framleiðslu, og hin triði møguleikin var at emansipera bøndurnar. Av nýggjum møguleikum var nevndur møguleikin fyri at økja um hetlendsku arbeiðsmegina umborð á skotsku hvalaskipunum í Grønlandi, at fara undir sildafiskiskap og at byrja framleiðslu av línklæði (Smith 1986: 117).



*Fiskiskip og bátar í Scalloway í 1762. Henda málningin málaði R. Irvine í 1894 eftir upprunaligari mynd. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

Ætlanir vóru frammi um at fáa statin at taka lut og stuðla hesum átøkum, men tað kom ikki so nógv burtur úr tí, og tí ber til at siga, at staturin ikki beinleiðis blandaði seg upp í framtíðina hjá Hetlandi (Smith 1986: 121). Tað var tí upp til nýggju handilsmenninar at standa fyri moderniseringini av landinum, og teir komu sum kapitalistar at standa í andstøðu til gomlu lairdarnar, sum gjørdu alt fyri at verja gomlu skipanina (Smith 1986: 129).

## 6.3 James Hay og vinnuvirksemi hansara

Tann fremsti av nýggju handilsmonnunum var James Hay. Hann var harðliga ímóti „the Zetland Method", og hann arbeiddi áhaldandi fyri at menna bæði silda- og toskavinnu, sum skuldi slíta tað valdið, sum lairdarnir við jarðarognum sínum høvdu á øllum samfelagnum (Smith 1986: 34). James Hay fór so smátt undir at keypa fisk í 1777. Ein orsøk til, at hann kundi royna seg sum handilsmaður, var, at hann hevði vunnið fitt av peningi við smugling, og henda pening kundi hann síðani brúka til at seta gongd í annað virksemi (Smith 1986: 137). Tað hevur verið róð framundir, at íløgur hansara í silda- og toskafiskiskap í hvussu er partvíst vóru gjørdar fyri at fjala út yvir smugling, og vinningurin á smuglingini var størri enn tapið av fiskiskapinum (Smith 1986: 159). Virksemi hansara rakk

*James Hay (1750-1831) gjørdist týdningarmiklasti vinnulívsmaðurin í Hetlandi. Ein av ætlanum hansara var at reka skip saman við Ryberg handlinum í Havn. (Mynd: Hay & Company: Merchants in Shetland)*



tíðliga heilt til Føroya, tí í 1785 skrivaði hann til Urbanus Flor, sum var leiðari í Rybergs handli í Havn, og greiddi honum frá einari av ætlanum sínum. Hann ætlaði at fáa Rybergs handil at reka skip saman við sær, tí so kundu báðir partar fáa fyrimun av at reka skipini sum ávikavist donsk ella bretsk alt eftir, hvat loysti seg best í ymiskum støðum (Smith 1986: 145).

Fleiri aðrar kendar søgur eru um smuglingina hjá James Hay, og eingin ivi er um, at hetta virksemið hevði stóran týdning í at skapa kapitalgrundarlag fyri handilsvirkseminum, sum gjørdist tað týdningarmiklasta í Hetlandi í fyrru helvt av 19. øld. Tað slepst eisini illa undan at hugsa, hvussu tað kundi gingist í Føroyum, um myndugleikarnir ikki vóru so strangir í eftiransing síni, og t.d. Nólsoyar Páll slapp at byggja sær ein kapital upp, sum síðani kundi verið grundarlag undir nýggjum vinnuligum átøkum. Embætismenn høvdu eyguni eftir øllum ólógligum handli fyri at verja Einahandilin, og spurningurin er, um eftirlitið hevði verið so gott, um eingin einahandil var.

Longu áðrenn 18. øld var liðin, gjørdi ein nýggj vinna rættiliga vart við seg í Hetlandi. Tað var hvalaveiðan í Grønlandi, har hetlendingar í stóran mun mannaðu hvalaveiðuskip úr Skotlandi og Onglandi. Hesi skip góvu hetlendingum møguleikan fyri at vinna pening uttan fyri gomlu skipanina. Lairdarnir sóu skjótt vansan við hesum og royndu at tryggja sær, at tað gjørdust teir, sum skaffaðu hvalaveiðuskipunum manning, men tað eydnaðist teimum ikki, tí tað gjørdust serliga spírandi handilsmenn, sum komu at átaka sær hesa uppgávuna. Búskaparliga merktu inntøkurnar frá hvalaveiðuni, at kapitalur fekst til at gera íløgur í toska- og sildaskip (Smith 1986: 225), og hvalaveiðan gjørdi eisini sítt til at byggja upp siðvenjuna við, at hetlendingar fóru út at sigla við skipum í bæði hernaðarflotanum



*Hvalaveiða undir Grønlandi gav hetlendingum ein møguleika at virka uttan fyri skipanina hjá lairdunum. Her liggur hvalaveiðuskipið „Diana“ úr Dundee í Godhavn í Grønlandi. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

og handilsflotanum (Smith 1986: 226). Við hvalaveiðuskipunum fingu nakrir hetlendingar seg royndar í eini kapitalistiskari skipan við fríari arbeiðsmegi, og hetta frælsið gjørdi sítt til at minka um trælalíka sambandið, teir frammanundan høvdu havt við lairdarnar (Smith 1986: 230).

Síðst í 18. øld fóru hetlendingar eisini at royna seg í sildavinnuni. James Hay royndi at fáa samvinnu í lag við skotskar fyritøkur, og í 1786 varð avtala gjørd um at royna við fýra skipum (Smith 1986: 245). Roynt varð eini 3 ár afturat, men fyritøkan fekst ikki at geva yvirskot, og tí varð ikki roynt aftur í 1790 (Smith 1986: 248). James Hay bíðaði í 20 ár, áðrenn hann royndi aftur í 1809, og hesa ferð kom rættilig gongd á vinnuna, tá fyrstu byrjanartrupulleikarnir vóru fingnir av vegnum, og gjøgnum 1820- og 30-árini sá út til, at henda vinnan fór at kollvelta hetlandska samfelagið (Smith 1986: 249). Soleiðis gekst kortini ikki, tí eftir at hava rakt loftið í 1834 við 41.000 tunnum av sild, minkaði sildafiskiskapurin aftur, so at hann í 1839 bara var 4.872 tunnur (Smith 1986: 254). Uttan at fara alt ov langt inn á evnið, so var ein av orsøkunum til, at tað gekst so illa við sildafiskiskapinum í longdini, at sildavinna gjørdist ein partur av „the Zetland Method“ heldur enn at bróta við skipanina. Tað merkti, at sild bara varð fiskað um heystið, tá ið bæði landbúnaðurin og summarfiskiskapurin fyri lairdarnar loyvdi tí, men um heystið var sildin so rak, at lítil prísur fekst fyri hana í mun

til sild, sum varð fiskað um várið (Smith 1986: 264). Á henda hátt ber eisini til hjá Smith at siga: „In the end the real failure was that of the Hays and others like them to break the stranglehold of the haaf and of the fishing tenure system on Shetland society and economy.“ (Smith 1986: 268).

Royndir at menna fiskivinnu við deksførum vóru gjørdar heilt afturi í 1742 ella 1743 (Goodlad 2014: 60), uttan at tað eydnaðist at fáa rættiliga gongd á. Tíðliga í 19. øld eydnaðist at seta gongd á hetlendska toskaveiðu við sluppum (Goodlad 2014: 2) Tá høvdu handilmenn í eina tíð sett pening í havútróður ella „haaf fishing“ á sama hátt sum gomlu landánararnir, og tað var kapitalur úr hesi vinnugrein, sum varð nýttur til at keypa deksfør. Aðrir hetlendingar høvdu vunnið pening í Royal Navy ella umborð á hvalaveiðuskipum undir Grønlandi og kundu á tann hátt vera við til at gera íløgur í deksfør (Goodlad 2014: 66).

## *6.4 Fiskivinna við almennum stuðli*

Samstundis sum handilsstættin mentist, mentist statsvaldið eisini, og almennu myndugleikarnir vildu fegnir menna bretsku fiskivinnuna. Longu í 1718 varð ein stuðulsskipan, nevnd debenture, sett í verk, sum gav fiskaútflytarum 3 £ í stuðuli fyri hvørt tons av longu ella toski, sum teir útfluttu. Fyri at seta enn meira ferð á, kom enn ein stuðulskipan í 1808. Henda skipanin, nevnd vessel bounty, veitti stuðul eftir tonsatalinum á teimum skipunum, sum fiskaðu (Goodlad 2014: 72).

Serliga henda seinna stuðulsskipanin hevði til endamáls at fáa fleiri deksfør at fiska, og hesin stuðulin kann ikki undirmetast, tá ið talan er um byrjanina á hetlendskari fiskivinnu við deksførum. Samtíðar greiningar vístu, at samlaða inntøkan hjá einum miðal skipi var 198 £. Av teimum komu 29,25 £ frá debenture, og 81 £ komu frá vessel bounty. Tað merkir, at ikki minni enn 56 % av inntøkuni hjá einum miðal skipi var almennur stuðul. Um hetta segði granskarin John Goodlad, at „this is a remarkable degree of state subsidy at a time of British laissez-faire capitalism.“ (Goodlad 2014: 74). Goodlad heldur, at uttan stuðulin er ivasamt, um toskafiskiskapurin hjá hetlendingum yvirhøvur var byrjaður (Goodlad 2014: 168).

Friðurin í Evropa í 1815 fekk eisini stóra ávirkan á menningina av hetlendskari toskavinnu, tí umframt at viðurskiftini sum heild gjørdust meira støðug, so hevði friðurin við sær, at spanski saltfiskamarknaðurin læt uppaftur (Goodlad 2014: 20). Fram til 1760-árini hevði marknaðurin í Hamburg verið týdningarmiklasti marknaðurin fyri hetlendskum fiski, men tá tóku Miðjarðarhavslond, serliga Barcelona, yvir (Smith 1986: 94).

Í 1810 varð sluppin „Mary“ gjørd út til fiskiskap, og hon fiskaði 5,6 tons kring oynna Fair Isle millum Hetland og Orknoyggjar. Árið eftir fiskaðu fleiri sluppir um summarið, og í 1817 fóru „Alert“ og „Thule“ sum tær fyrstu av álvara at fiska á toskabankanum, sum lá í ein útsynning úr Hetlandi. Í maimánaði árið



*Arthur Anderson, sum var við til at stovna bretska reiðaríið P&O, hevði stóran týdning fyri menningina av hetlendskari fiskivinnu. (Mynd: wikicommons)*

eftir fiskaði sluppin „Don Cossack“ meir enn 1000 toskar upp á ein dag, og tað staðfesti, at toskafiskiskapur við slupp var vorðin ein týdningarmikil partur av hetlendskari fiskivinnu (Goodlad 2014: 63). Í 1822 vóru 40 sluppir til fiskiskap (Goodlad 2014: 64), og miðalveiðan tey tíggju árini frá 1819 til 1829 var 369 tons. Besta árið var 1826, tá veiðan kom upp í 571 tons (Goodlad 2014: 69).

Tað var í hesum góðu tíðunum, meðan stór framgongd var í bæði toskafiskiskapi og sildavinnu, at fyritøkan Hay & Ogilvy var sett á stovn í 1822. Tað var ein týdningarmikil hending í búskaparsøgu Hetlands, tí felagið gjørdist so stórt, at tað nærum hevði monopol upp á útflutning og var týdningarmiklasta fyritøkan í silda- og toskafiskiskapi, eins og í øllum vanligum handli (Smith 1986: 177).

Allur hesin fiskiskapurin varð eisini gjørdur fyri at fáa almennan stuðul burtur úr stupulsskipanunum, men tann tíðin endaði 5. apríl 1830, tá ið báðar stuðulsskipanirnar vórðu avtiknar (Goodlad 2014: 75). Hetlendsk fiskivinna fór við avtøkuni inn í eitt heilt nýtt tíðarskeið, og samstundis sum studningurin hvarv, versnaði fiskiskapurin. 13 sluppir fiskaðu í 1830, og tær fingu bara 4,85 tons í miðal, og vinnan „hit an all time low from 1833 to 1835.“ (Goodlad 2014: 84) Lægst var hon í 1835, tá bara 58 tons komu upp á land (Goodlad 2014: 82).

Fiskivinna kom tó fyri seg aftur, og tað var serliga Arthur Anderson fyri at takka. Hansara felag tók stig til at virka fiskin betur, enn hann hevði verið virkaður, og tað gjørdi, at hetlendskur fiskur slapp undan at verða mettur sum vánaligur fiskur. Anderson gavst longu í 1847, men hann hevði víst vegin fram, og aðrir tóku við eftir hann og mentu vinnuna víðari (Smith 1986: 287). Fiskivinnan gekk væl fram

til 1870-árini, tá ið hon byrjaði at minka, og minkingin helt áfram, til fiskivinnan hvarv heilt um aldaskiftið 1900. Orsøkirnar til, at fiskivinnan ikki megnaði at halda fram, vóru fleiri. Ein var, at føroyingar yvirtóku hetlendsku vinnuna, ein onnur at dampriknir trolarar komu inn í vinnuna, og at enda kundi tað sæð út til, at toskastovnarnir fóru at ferðast norðureftir hesa tíðina (Smith 1986: 290).

## *6.5 Shetland Night-Mare*

So hvørt, sum nýggjar vinnur mentust, fingu hetlendingar høvi at virka í teimum, og á tann hátt gjørdust teir leysari av landbúnaðinum, enn teir høvdu verið (Smith 1986: 168). Hetta átti at verið rætti vegurin fram móti einum meira modernaðum samfelag, men búskaparliga niðurgongdin í 1830-árunum og fyrstu áratíggjuni eftir tað vísti, at handilsmenn við virksemi sínum ikki høvdu megnað at loyst hetlendingar úr tí haftinum, sum lairdarnir høvdu havt á teimum í øldir.

Tá ið bæði fyritøkan Hay & Ogilvy og Shetland Bank fóru á heysin í 1842, styrktist „the Zetland Method" aftur, tá ið handilsmenn fóru at virka á sama hátt, sum lairdarnir høvdu gjørt. Hay & Ogilvy og banki teirra høvdu staðið á odda fyri einari nýggjari búskaparligari skipan, men hon vísti seg ikki at halda, og tá vann konservativa hugsanin aftur frama (Smith 1986: 299). Eftir búskaparligu bakkøstini síðst í 1830-árunum gjørdist úrtøkan úr landbúnaðinum aftur álitið hjá fólki, og gamla skipanin, har uppsitarar fiskaðu fyri góðseigaran, vann aftur frama.

Soleiðis øktist haaf fiskingin í 1850-árunum, og ásannast mátti, at vinnuligu framtøkini í fyrru helvt av øldini ikki høvdu megnað at broytt sosialu skipanina (Smith 1986: 308) Arthur Anderson nevndi í síni tíð hesa skipan fyri „Shetland Night-Mare", tí handilsmenn høvdu ikki megnað at innført eina nýggja kapitalistiska skipan. Tvørturímóti vísti tað seg, at teirra áhugamál gjørdust tey somu sum áhugamálini hjá lairdunum (Smith 1986: 311). Sjálvt í landbúnaðinum var afturgongd, tí nýtslan av plógv helt uppat, og øll jørðin varð velt við spaka (Smith 1986: 313).

Henda ringa støðan gjørdi, at tað almenna tók stig til fleiri kanningar av hetlendska búskapinum. Ein teirra var gjørd av the Truck commission í 1872. Nevndin fann út av, at handilsmenn og lairdar høvdu funnið saman í eina skipan, har uppsitarar og onnur vóru kroyst inn í eina skuldarstøðu, og tí vóru tey noydd til at fiska fyri tann, sum tey skyldaðu til. Henda støðan var so inngrógvin í fólk, at tey høvdu ilt við at fáa eyga á nakrar aðrar tilverumøguleikar (Smith 1986: 319). Uppsitarin av jørðini megnaði ikki at gjalda síni leigugjørd av jørðini eina, og tí noyddist hann at fiska fyri at fáa pening til leiguna (Smith 1986: 321). Alt hetta gjørdi, at lairdarnir fóru at rokna vanliga hetlendingin sum eitt barn, og at hann sum slíkur hevði brúk fyri onkrum at ansa eftir sær



SECOND REPORT

OF

THE COMMISSIONERS

APPOINTED TO INQUIRE INTO

THE TRUCK SYSTEM

(SHETLAND).

REPORT

Presented to both Houses of Parliament by Command of Her Majesty.

EDINBURGH:
PRINTED BY MURRAY AND GIBB,
FOR HER MAJESTY'S STATIONERY OFFICE.

1872.

[C. 555.] [Price 10d.]

REPRINTED BY THULEPRINT LIMITED SANDWICK SHETLAND
1978

*Truck commission kom í 1872 fram til, at lairdar og handilsmenn høvdu funnið út av at kroysta fólk í eina skuldarstøðu, so at tey noyddust at fiska fyri tann, sum tey skyldaðu pening til.*

(Smith 1986: 325). Hetta eru sjónarmið, sum líkjast ógvuliga nógv teimum, sum vóru brúkt av fólki, sum vóru ímóti at avtaka Einahandilin í Føroyum.

Langt inn í 1870-árini var „The Zetland Method" ein virkin og frísk skipan, sum megnaði at fevna um bæði hvalaveiðuna og toskaveiðuna (Smith 1986: 334), men tá ið The Napier Commission fór at kanna Hetland í 1882, var nógv broytt (Smith 1986: 339). Ein orsøk var, at góðseigarar vóru farnir undir at býta jørðina sundur á ein øðrvísi hátt og løgdu størri dent á seyða- og neytahald enn frammanundan. Á tann hátt brutu teir sjálvir sín part av avtaluni við uppsitarar sínar. Hetta varð ikki gjørt av hugsjónarligum orsøkum, men tí at støðan hjá landbúnaðinum broyttist, m.a. tá ið fast og regluligt samband fekst við bretska meginlandið, og eftirspurningurin eftir livandi djórum og kjøti øktist (Smith 1986: 341). Hetta hevði eisini við sær, at fólkatalið fór at fella, um somu tíð sum hetlendingar sluppu úr sínum gamla hafti, men aftanfyri fallið lógu tøl, sum vístu stóran vøkstur í tali á fólki í býunum Lerwick og Scalloway, meðan minkingin serliga var í teimum økjum, har skipanin við „the Zetland Method" hevði verið sterk (Smith 1986: 350).

Umframt hesa broyting hevði tað stóran týdning, at staturin við sínum nevndarfrágreiðingum frá 1872 og 1882 vísti, at tað almenna metti Hetland at vera eitt tilafturskomið øki sosialt og búskaparliga, og tað hóskaði illa til eina so siðmenta tjóð sum Bretland. Tí tók eisini staturin stig til at gera sítt til at


REPORT

OF

HER MAJESTY'S COMMISSIONERS OF INQUIRY

INTO THE CONDITION OF

THE CROFTERS AND COTTARS

IN THE

HIGHLANDS AND ISLANDS OF SCOTLAND.

WITH APPENDICES.

Presented to both Houses of Parliament by Command of Her Majesty.

EDINBURGH:

PRINTED BY NEILL & COMPANY.

1884.

*The Napier Commission ásannaði í 1884, at nógv var broytt síðstu árini. Grundarlagið undir the Zetland Mathod var horvið, tí nýggir vinnumøguleikar høvdu fingið lairdarnar at býta jørðina sundur á ein øðrvísi hátt.*

bremsa gomlu skipanini, so at Hetland kundi koma inn á somu menningarleið sum restin av ríkinum (Smith 1986: 355).

## 6.6 Samandráttur

Ein stórur stuðul undir tí støðuga føroyska bóndasamfelagnum var, at kongur var einasti feudali jarðaránarin. Tað gjørdi, at lítil og eingin broyting var í ognarviðurskiftunum og í sambandinum millum festubøndur og jarðaránara í fleiri øldir. Í so máta var støðan ein heilt onnur í Hetlandi. Har keyptu nakrir fáir skotskir lairdar alla jørðina tíðliga í 18. øld, og við teimum mentist ein skipan, nevnd Zetland Method, har festubøndurnir brúktu summarið til at fiska fyri at gjalda leiguna av jørðini. Vánalig ár gjørdu skjótt, at bøndurnir komu at standa í skuld hjá lairdunum, og tá gjørdust teir mestsum trælir. Soleiðis gjørdist Zetland Method ein rættilig eyðræningarskipan. Fyri lairdarnar ráddi um at fáa størri og størri inntøku av ognum sínum, og tá ið inntøkan kom av tí, sum varð fiskað um summarið, ráddi um at fáa so nógva arbeiðsmegi, sum til bar, at fiska. Tí býttu teir garðarnar sundur í smærri og smærri eindir, so at talið á festibóndum kundi økjast. Tað var í stóran mun grundarlagið undir høga fólkatalinum í Hetlandi,

sum embætismenn nýttu sum íblástur til at fremja samfelagsligar broytingar í Føroyum.

Eins og í Føroyum vóru royndir gjørdar at brúka fiskivinnu við deksførum til at koma burtur úr Zetland Method, og tað sá út til at ganga væl, tá ið Pløyen gjørdi hetlandsferð sína í 1839, men bara trý ár seinni kollsigldi nógv tann størsta vinnufyritøkan í Hetlandi, og gamla eyðræningarskipanin gjørdist aftur tann ráðandi í landinum. Sostatt eydnaðist tað ikki fiskivinnuni í Hetlandi at verða tann moderniseringsagenturin, sum ætlanin var, at hon skuldi verða í Føroyum. Ekstraktiva skipanin vann í Hetlandi, um somu tíð sum gongd var komin á at gera upp við hana í Føroyum, og tað gjørdi helst sítt til, at fólkatalið í Hetlandi fór at falla eftir 1861, samstundis sum rættilig gongd kom á fólkavøksturin í Føroyum.

# 3. partur Amtmaðurin og fiskivinnan

# 7. kapittul
# *Fiskivinna kemur aftur á borðið hjá amtmanninum*

Eftir miseydnaðu royndirnar hjá Jóhan Hendriki Weyhe og eftir, at Løbner í 1821 var komin til ta niðurstøðu, at landbúnaðurin framhaldandi skuldi vera høvuðsvinnuvegurin í Føroyum, hoyrdist ikki nógv aftur til fiskivinnu í nøkur ár. Men hesi árini broyttust fortreytirnar fyri einari menning av fiskivinnuni kortini grundleggjandi, sum vit hava sæð í undanfarnu kapitlum. Við einum amtsstovni í Føroyum bar ikki longur til at siga, at staturin var veikur, og við teimum nýggju amtmonnunum við løgfrøðiligari bakgrund fóru liberalu hugsjónirnar, sum miðfyrisitingin í Keypmannahavn hevði tikið til sín, eisini at gera vart við seg. Málið var ikki longur at halda fast í einahandilsskipanini fyri at stuðla veika statinum. Málið var nú at menna landið á øllum økjum, og tað gjørdist skjótt greitt, at júst Einahandilin mangan stóð í vegin fyri slíkari menning. Einahandilin skuldi avtakast, men tað kundi ikki gerast, fyrr enn føroyingar vóru komnir upp á eitt menningarstig, har teir vóru førir fyri at gagnnýta fyrimunirnar av fríum handli. Uppgávan hjá amtmanninum varð tí at menna ella fyrireika føroyingar til ta nýggju tíðina, sum skuldi koma, og ein komandi fiskivinna gjørdist skjótt týdningarmiklasti luturin í hesi fyrireiking. Meðan fyrireikingarnar fóru fram, var føroyska samfelagið sett í eitt ímyndað bíðirúm at bíða eftir, at teir, sum tóku avgerðirnar í Keypmannahavn, søgdu, at føroyingurin var vorðin so siviliseraður, at hann var førur fyri at klára seg í modernaða heiminum.

## *7.1 Tillisch tekur málið upp í 1832*

At búskaparliga menningin í grannalondunum var stór hesi árini, merktist í Føroyum, millum annað tí, at útlendska fiskivinnan undir Føroyum mentist, og alsamt fleiri útlendsk fiskifør komu á føroyska landgrunnin. Tað gjørdi, at føroyingar, sum stríddust við sínum útróðrarbátum, fóru at óttast enn meira fyri, at útlendingarnir fóru avstað við øllum fiskinum, og tí kærdu teir javnan fyri amtmanninum. Fyri teir ráddi um framhaldandi at sleppa at rógva út á sama hátt, sum forfedrarnir høvdu gjørt, og einasti møguleiki at gera tað var at forða útlendsku fiskiskipunum í at fiska.

Embætismenninir vóru eisini ørkymlaðir av mongu fremmandu skipunum, og teir noyddust at taka atlit til kærurnar frá útróðrarmonnum. Fyri embætismenninar var tað ikki nøktandi, at útlendingar komu inn um sjómarkið, uttan

at nakað kundi gerast við tað, men størsta vandamálið hjá teimum var kortini, at nógv lógarbrot fylgdu í kjalarvørrinum á útlendsku skipunum, tá ið tey viðhvørt løgdu at landi. Í regluligu frágreiðingini um landsins støðu greiddi Frederik Ferdinand Tillisch amtmaður 12. juni 1832 Rentukamarinum frá, at fiskaríið framhaldandi var sera gott, men at tey mongu fremmandu fiskiskipini, „som sværme omkring Landet", vóru ein stór byrða, tí tey forðaðu útróðrinum, og tí gjørdist tað alsamt vanligari at fáa kærur um hesi skipini[65].

Stutt eftir, 23. juni 1832, tók Tillisch amtmaður málið upp aftur og skrivaði gjølligari frágreiðing til Rentukamarið um fremmandu skipini. Hann greiddi frá, at kærur vóru vanligar nú, tí nú komu fremmandu skipini nógv nærri landi, enn tey gjørdu fyrr. Tað hevði við sær, at fleiri skip kundu liggja á teimum miðunum, sum vóru tættast landi, og tá ið tað hendi, fingu føroysku útróðrarbátarnir einki, tá ið teir komu á miðini um morgunin, sjálvt um teir undir vanligum umstøðum høvdu kunnað fylt bátin eftir stuttari tíð. Fyri Tillisch var tað ein uppaftur størri trupulleiki, at fiskiskipini javnan komu inn á tær havnirnar, sum vóru longst burtur frá Havnar býi. Fólk høvdu fingið at vita, at tey skuldu als einki samband hava við hesi skip, uttan so at tey vóru í neyðstøðu, men tað var torført og javnan ógjørligt at halda, tí manningarnar virdu als ikki boðini, sum tær fingu frá eftirlitsmonnunum í havnunum.

Tvørturímóti fóru teir í land og inn til fólk bæði nátt og dag. Teir gjørdu seg javnan inn á fólk, men tey kundu ella tordu einki at gera, og tá ið amtmaðurin einaferð hevði fingið boð og var komin á staðið, vóru skipini langt síðan farin út aftur. Tillisch helt, at skipini høvdu onga orsøk at leggja at landi, men bara gjørdu tað til stuttleika. Hann visti um eitt dømi, har sama skip upp á 14 dagar hevði verið inni í 4 ella 6 havnum, og hvørja ferð var grundgevingin, at teimum vantaði vatn. Alt hetta fekk Tillisch at ynskja, „at der paa en eller anden Maade kan blive sat Grændser for det Uvæsen, som hidtil i denne henseende har fundet Sted, og som stedse mere og mere vil tiltage, jo mere de omhandlede Skibe blive bekiendte med Landet."[66]

Trupulleikin, sum mobiliteturin í fiskivinnuni hevði givið embætismonnum í Føroyum, var ikki longur, at føroyingar við fiskiskipum kundu fara sær út í heim og á tann hátt hótta einahandilsskipanina. Nú var trupulleikin nærum vendur á høvdið, tí nú var tað mobiliteturin hjá útlendsku fiskiskipunum, sum voldi trupulleikar av ymiskum slagi.

Rentukamarið fór eisini í verjustøðu, tá ið tað viðgjørdi málið, og tá ið Rentukamarið svaraði eitt ár seinni, 29. juni 1833, tóku teir føroysku kærurnar um forðingar í útróðrinum í álvara, men løgdu eisini stóran dent á, at fremmandu fiskimenninir vóru ein meinbogi fyri Einahandilin, og vandi var fyri, at smittusjúkur kundu koma við teimum. Rentukamarið hevði viðgjørt málið saman við Kanselinum og stjórnini í Quarantaine-Foranstaltningerne. Teir

65 TSS. Færø Amt. Kopibók J, bræv nr 138. Bræv til Rentukamarið dagfest 12. juni 1832.
66 TSS. Færø Amt. Kopibók J, bræv nr. 139. Bræv til Rentukamarið dagfest 23. juni 1832.



*F.F. Tillisch, amtmaður, helt, at føroyingar áttu at tikið kappingina upp við framkomnu fremmandu fiskiskipini, heldur enn at staturin fór at verja føroyska sjóøkið. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

vóru samdir um, at embætismenn skuldu ansa væl eftir ólógligum sambandi við land og vístu til plakatirnar frá 6. oktober 1819 og 10. mars 1820, um tær vóru galdandi fyri Føroyar. Kom ólógligur handil fyri, skuldi fyriskipan frá 3. mai 1723 brúkast, soleiðis sum amtmaðurin hevði skotið upp. Um hesar fyriskipanir ikki vóru nóg mikið til at fáa fremmandu skipini at fara, bað Rentukamarið Tillisch koma við uppskotum um, hvat annað kundi gerast fyri at forða fyri ólógligum handli og fyri at tryggja føroyska útróðurin ímóti skaðiligu ávirkanini av fremmandu fiskiskipunum[67].

### 7.1.1 Amtmaðurin mælir til at menna fiskivinnu

Tillisch hugsaði seg helst væl um hetta heystið, og 8. januar 1834 setti hann seg at skriva sínar hugsanir til Rentukamarið. Tá var hann komin eftir, at tað neyvan bar til at verja seg móti útlendskum fiskiførum, men at rætti vegurin heldur var at taka kappingina ímóti teimum upp. Í brævinum skrivaði hann m.a. hetta áhugaverda reglubrotið:

> Idet jeg derfor herved giver meg den Ære at efterkomme denne Befaling, tillader jeg mig for det første ærbødigst at bemærke, at det ovennævnte Afbræk ifølge Indbyggernes eenstemmige Paastand formentlig bestaaer deri, at Fiskeri paa de

67 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra G, bræv nr. 194. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannin dagfest 2. juni 1833.

aabne Baade ikke skal lykkes paa de Fiskerbanker, paa hvilke til samme Tid et eller flere større Fartøier ligge for at fiske. Det vil heraf indsees, at dette Afbræk ikke saa meget grunder sig paa Krænkelsen af Landets Søterritorium, som paa de Fremmedes Overlegenhed med Hs til Fiskeriets Drift. Skiøndt det derfor vel ikke kan nægtes, at de fremmede Fiskerskib ofte komme Landet saa nær, at dets Søterritorium derved krænkes, saa vil det dog deels være vanskeligt og deels forbundet med altfor uforholdsmæssige Omkostninger ganske at forhindre dette, og jeg antager derfor, at Indbyggernes Klager paa den rigtigste og letteste Maade vilde afhiælpes, naar de bleve satte istand til med Fordeel at kunne søge Fiskeriet med Dæksfartøier.

Tað var við øðrum orðum ikki so nógv tað, at fremmandu skipini komu inn á føroyskt sjóøki at fiska, sum tað at fremmandu fiskiskipini tøkniliga vóru nógv meira ment enn aldagamli føroyski útróðurin, sum var trupulleikin. Tí var loysnin heldur ikki at fáa útlendsku skipini burtur, men heldur at menna føroyingar til at kunna kappast við útlendsku skipini á sama menningarstigi. Tíðin var eisini búgvin til tað, tí fólkatalið var farið at vaksa, og Tillisch ásannaði:

Da Folkemængden endelig stedse tiltager, og Erhvervsgrenene paa Land formedelst det herværende ustadige Clima ere saa højst mislige og usikkre, synes det saa meget mere nødvendigt i tide at tænke paa Foranstaltninger, hvorved nogen mere Fordeel kunde vindes af det Landet omgivende Hav[68].

Soleiðis vóru trýst frá bæði útlendskum vinnuáhugamálum og vaksandi fólkatalið við til at broyta áhugan hjá tí almenna fyri nýggjum vinnum. Í seinna sitatinum er eisini áhugavert at síggja ein heilt øðrvísi hugburð til landbúnaðin enn tann, sum hevði verið galdandi. Nú var landbúnaðurin ikki longur hildin at vera tað trygga grundarlagið undir samfelagnum, og tí var neyðugt at fara undir at kanna, hvørji virði kundu vinnast úr havinum.

### 7.1.2 Broytingar í Einahandlinum treyt fyri fiskivinnu

Tá ið Tillisch amtmaður hevði staðfest, at rætti vegurin var at hjálpa føroyingum at fiska við deksførum, fór hann undir at viðgera, hvussu hetta kundi gerast. Hann ásannaði, at ein fortreyt fyri einari slíkari menning var, at møguleikarnir fyri at sleppa av við saltfisk batnaðu, tí roknast kundi ikki við, at fiskur frá deksførum kundi virkast til turran fisk. Saltaður toskur var grundarlagið undir fiskiskapi við deksførum, og sum var, var prísurin á saltfiski í handlinum alt ov vánaligur. Handilin læt 6 ríkisdálar fyri eina tunnu av saltfiski, men tunnan sjálv kostaði 3 ríkisdálar, og ein tunna av salti kostaði 5 ríkisdálar. Slíkar umstøður „gjør det aldeles umuligt for Indbyggerne at søge denne Næringsvei." Tí var ein broyttur príspolitikkur fortreyt fyri, at nøkur fiskivinna kundi mennast.

68 TSS. Færø Amt. Kopibók M, bræv nr. 51. Bræv til Rentukamarið dagfest 8. januar 1834.

Tillisch var als ikki í iva um, at føroyingar bæði høvdu hug og evni til fara at fiska við egnum skipum. Frægasti mátin hjá tí almenna at eggja til at fara undir hesa nýggju vinnuna, var at tryggja atgongd til ein marknað at selja fiskin á, sum gav so góðan prís, at „de blot kunde see sig nogenledes sikkrede for aabenbart Tab."

Tillisch vildi ikki sjálvur gera seg klókan upp á prísir, men mælti til, at serfrøðingar funnu út av, hvussu saltaður toskur kundi seljast í handlinum við vinningi, tí so hvurvu allar orsøkir til at kæra, samstundis sum landið fekk eina munagóða nýggja inntøkukeldu.

> Ingen anden Opmuntring eller Opoffrelse fra det Offentliges Side i denne Henseende enten er nødvendig eller tilraadelig, thi ikkun naar Indbyggerne selv eie de Skibe, hvormed Fiskeriet skulle drives, og dens Fortieneste alene beroer paa dette Udfald, kan man vente, at denne Næringsvei vil blive drevet med Iver og paa den for Landet fordeelagtigste Maade.

Tillisch trúði fult og fast uppá, at fríu marknaðarkreftirnar og frælst vinnulív uttan almennan stuðul vóru vegurin fram. Tað einasta, tað almenna skuldi blanda seg uppí, var prísurin hjá Einahandlinum og møguleikarnir fyri at fáa atgongd til teir røttu marknaðirnar.

Restin av tilmælinum hjá amtmanninum um fremmandu fiskiskipini var um loynihandilin, sum myndugleikarnir óttaðust fyri. Tillisch segði, at einki rættiligt loynihandilsskip hevði verið í Føroyum síðan 1825, og at ólógligur handil bara var knýttur at fiskiskipunum og øðrum skipum, sum komu higar av ymiskum ávum. Hann helt, at fyri hesi var ólógligur handil ikki høvuðsmálið, og tí kundi hesin handil „ansees for høist ubetydelig." Kortini mælti hann til, at donsku konslarnir í Dunkerque, Ostende og Lerwick fingu til uppgávu at fáa myndugleikarnar har at kunna skiparar um, hvørjar treytirnar vóru í Føroyum. Í aðrar mátar helt hann ikki, at tað var neyðugt at gera so nógv beinleiðis átøk við ólógliga handilin.

Hinvegin kundi nógv gerast óbeinleiðis við at taka tær freistingarnar burtur, sum førdu til, at føroyingar kundu freistast til at fara undir ólógligan handil. Hesar freistingar lógu allar í stirvnu einahandilsskipanini, og Tillisch tók fram 8 viðurskifti, sum hann helt vóru mest átrokandi. Tvey tey fyrstu punktini vóru um, at skipanin frá 1691 ásetti, at handilin skuldi hava allar vørur á takstlistanum og skuldi taka ímóti øllum vørum á listanum yvir returvørur. Tá ið vøra vantaði í handlinum, hildu føroyingar seg hava rætt til at keypa hana aðrastaðni. Tillisch amtmaður hevði fleiri ferðir biðið handilsforvaltaran ansa eftir hesum, tá ið hann skrivaði sín bíleggingarlista, men enn hevði tað ikki bøtt um støðuna. Tillisch helt, at ein orsøk var, at handilsforvaltarin sjálvur slapp at eiga svinnprosentini á ávísum vørum, og tí syrgdi hann fyri at bíleggja so lítið av hesum vørum, at hann kundi fáa hesi prosentini. Í øðrum førum royndi handilin at bíleggja lítið av vøru, sum spiltist, tí so slapst undan tí eftirlitinum, sum kravdist av tílíkari



*Meðan fiskiskipini í grannalondunum mentust í hvørjum, hildu føroyingar fram at rógva út við áttamannaførum. (Mynd: Tjóðsavnið 4827F05528C)*

vøru. Tað var við øðrum orðum persónligur vinningur, sum gjørdi, at trot var á ávísum vørum.

Loysnin var, at handilsforvaltarin fekk ábyrgdina av, at vøra ongantíð manglaði, og kundi hann ikki grundgeva fyri, hví onkur vøra var uppi, so skuldi hann hefta fyri tað. Viðvíkjandi vørumóttøkuni hendi tað viðhvørt, at íbúgvar ikki sluppu av við vøruna. Tað var t.d. hent sama heyst, tá ið suðuroyingar ikki fingu avreitt sítt grindalýsi, tí handlinum vantaði tunnur. Tillisch visti, at føroyingar goymdu lýsið í grindakíkum, og tá var tað so skjótt, at rottur ella annað kundi oyðileggja vøruna. Á tann hátt kundi „en stor deel af et Aars Indtægt“ forkomast, og tí var tað „indlysende, hvor meget de under saadanne omstændigheder maae fristes til at søge deres Varer afsatt til Fremmede.“

Punkt 3 og 4 snúðu seg um vørugóðsku, tí tað var javnan hildið, at góðskan á vøruni, sum varð send til Føroya, ikki altíð var so góð, sum hon átti. Tá var lítið at siga til, at íbúgvarnir tóku av vørum við betri góðsku, um høvið beyðst. Ein onnur stór eggjan til loynihandil var øll tann vøran, sum varð vrakað við handilin, og so tær fínaru ullvørurnar, sum als ikki stóðu á handilstakstinum. Øll henda vøran, sum handilin ikki vildi hava, fór onkra aðrastaðni, og tí var hon týdningarmikil partur í eggjanini til loynihandil. Tillisch mælti tí til eina nýggja vrakingarskipan og til, at vrakað ullvøra varð latin inn til Leigubúðina, so metast kundi um hana har, heldur enn at lata fólki hana aftur, tí føroyingar gingu ikki sjálvir í teimum klæðunum, sum teir seldu til handilin. Harumframt

mælti hann til, at fínari ullvøra varð tikin upp í takstlistan, ikki bara fyri at forða fyri loyniligum handli, men eisini fyri at geva serliga teimum fátøku fólkunum ein møguleika at fáa størri úrtøku úr ullarbeiðinum.

Í handilsskipanini var loyvt at innflyta vøru, sum handilin ikki seldi. Men tað skuldi flytast við handilsins skipum, og fraktkostnaðurin var ¼ av virðinum á vøruni. Hetta var alt ov kostnaðarmikið, og tí mælti amtmaðurin til at gera eina nýggja skipan, so at ongin orsøk var at fáast við ólógligan handil orsakað av hesum. Amtmaðurin helt eisini, at gamla skipanin við eftirliti við krambúð og pakkhúsum, sum var fastur partur av arbeiðinum hjá løgrættumonnum, var dottin niðurfyri. Hann helt heldur ikki, at henda skipanin skuldi innførast aftur, men eftirlit var neyðugt, og besti mátin var helst, at embætismenninir, í hesum føri fútin og kirugurin, í felag tóku sær av hesum eina ferð um mánaðin. At enda helt amtmaðurin, at lønin hjá fólkunum í handlinum var alt ov lág, og tað eggjaði teimum til at fara undir ólógligt virksemi. Hann gjørdi tí eitt uppskot til eina nýggja lønarskipan. Hann helt eisini, at fleiri fólk áttu at verið knýtt at handlinum, tá nógv var at gera, tí sum nú var, kundu meir enn 30 bátar við manning liggja á Havnini í senn og bíða eftir at verða avgreiddir. Bátar kundu vera bundnir í Havn í meir enn 14 dagar, og tað var eyðsæð, at so nógvir spiltir dagar hjá so nógvum monnum í bestu vinnutíð var eitt stórt tap bæði persónliga og fyri landið[69].

Hetta svarið til Rentukamarið umboðar eitt skifti í hugburðinum hjá amtmanninum til, hvussu fram skuldi farast í Føroyum. Frammanundan hevði størsti denturin verið lagdur á at verja galdandi skipanir frá øllum ávirkanum uttanífrá, men nú ásannaði Tillisch amtmaður, at tað var ikki rætti vegurin fram. Tað rætta var, at føroyingar tóku kappingina upp móti útlendsku fiskiførunum, og heldur enn at verja einahandilsskipanina mælti hann til, at Einahandilin varð gjørdur so góður og lagaligur, at eingin orsøk var til at fáast við ólógligan handil. Hetta var av sonnum ein broyting, og hon vísti seg eisini í verki í tí politikki, sum amtmenninir frameftir hildu seg til. Við at fara inn á hesa rásina, settu teir seg samstundis eisini upp ímóti einahandilsskipanini og øðrum gomlum skipanum. Nýskipanarhugurin hjá Fríðriki 6. kongi var endiliga seyrað allan vegin niður gjøgnum embætisskipanina og út í ein av ytstu krókum í kongsríkinum.

## *7.2 Landhuusholdningsselskabet for Færø Amt*

Skuldu hesar liberalistisku ætlanirnar um at fáa gongd á eina fiskivinnu, uttan at tað almenna blandaði seg ov nógv uppí, eydnast, var neyðugt at kveikja áhugan millum føroyingar. Stórur tørvur var eisini á at fáa føroyingar at taka undir við teimum hugsjónunum, sum eyðkendu borgarastættina aðrastaðni, men spurningurin var, um tað bar til at gera tað, áðrenn gongd var komin á at

69 TSS. Færø Amt. Kopibók M, bræv nr. 51. Bræv til Rentukamarið dagfest 8. januar 1834.

menna nýggjar vinnumøguleikar. Við øðrum orðum var spurningurin, um tað við at bera føroyingum borgarliga hugburðin bar til fáa íbúgvarnar at vera við til at modernisera landið, ella um gongd skuldi setast á hesa moderniseringina fyrst, so at nýggjar stættir uppstóðu, sum kundu taka borgarliga hugburðin til sín. Við liberalu hugsjónini hjá Tillisch um, at tað almenna ikki skuldi taka lut í vinnuligum virksemi, var tað ikki so løgið, at hann valdi fyrra møguleikan.

Í Føroyum var eingin miðil at bera nýggja boskapin út við og einki stað at savna tey, sum kundu hugast at taka undir við nýggju hugsjónunum. Tað var helst fyri at skapa eitt slíkt stað, at Tillicsh amtmaður og Struer próstur 28. januar 1833 buðu monnum at gerast limir í einum felag, sum fekk navnið „Landhuusholdningsselskabet for Færø Amt". Eftir stovnandi fundin visti Tillisch at siga, at „næsten alle Landets Embedsmænd tilligemed et betydeligt Antal af Indbyggerne selv har formet sig i et Selskab under Navn af Landhuusholdningsselskabet for Færø Amt." Endamálið við felagnum var at eggja til og stuðla „ethvert Foretagende, som enten med Hensyn til Landbrug, Fiskeri eller Huusflid eller i nogen anden Henseende kan være til almindelig Nytte for Landet." Í fyrstu nevndini í felagnum sótu próstur, fúti, handilsforvaltari, pastor emeritus Schrøter og Tillisch amtmaður.[70]

Vit vita tíverri ikki nógv um virksemið hjá hesum felagnum, men ein fundur var á ólavsøku 1833, har limirnir savnaðu 75 ríkisdálar, 2 markar og 6 skillingar inn[71]. Helst hava aðrir fundir eisini verið, og hugsandi er, at hesir fundir og annað samskifti millum limirnar hevur gjørt sítt til, at amtmaðurin við skrivinum 8. januar 1834 valdi at leggja á annan bógv. Dagin fyri hevði hann skrivað til Rentukamarið við uppskoti um, at Landhuusholdningsselskabet fyribils skuldi taka sær av „Økonomisk Fond". Í brævinum helt Tillisch, at best var at lata „Bestyrelsen og Anvendelsen" av grunninum upp í hendurnar á monnum, sum kendu lokalu viðurskiftini og fólksins hugsanarhátt væl og virðiliga, tí slíkir høvdu dugað best at valt út tiltøk at stuðla. Í felagnum vóru „nogle af de forstandigste og meest oplyste Mænd i ethvert Syssel"[72].

Tað var Tillisch sjálvur, sum kom við hugskotinum um at seta á stovn „økonomisk fond". Tað gjørdi hann í grindareglugerðini, sum hann gjørdi uppskot til í 1831. Henda reglugerðin var næstan óbroytt gjørd til lóg árið eftir, og hon er millum fremstu dømini um, hvussu amtmenninir gjørdu gamla føroyska siðvenjulóg um til positiva lóg, sum var lættari at arbeiða við í løgfrøðiligu skipanini. Í § 29 kom at standa, at hvalur, sum av ymiskum orsøkum ikki kom upp í vanliga býtið, skuldi seljast á uppboði, og peningurin skuldi fara í „en oeconomisk Fond for Færøe Amt." Í viðmerkingunum til uppskotið skrivaði Tillisch, at amtið higartil hevði selt slíkan hval á uppboði, og vinningurin var

70 TSS. Færø Amt. Kopibók M, bræv nr. 50. Bræv frá Tillisch amtmanni til Rentukamarið dagfest 8. januar 1834.

71 SA. Den Administreende Direktion for den Kgl. Færøske Handel: Hovedbøger. Strømø 1830-1836.

72 TSS. Færø Amt. Kopibók M, bræv nr. 50. Bræv frá Tillisch amtmanni til Rentukamarið dagfest 8. januar 1834.


efter den gjældende Tyvslovgivning, med mindre Værdien af det Stjaalne er under 1 Rbdlr. Sølv, i hvilket Tilfælde Straffen ikkun er en Mulkt, efter Omstændighederne, fra 1 til 5 Rbdlr. Sølv.

§ 29.

De Hvaler, som opflyde eller opfiskes i Hvalvaagen, efterat Sysselmanden har begyndt sin Beregning, men dog forend Delingen er endt, blive, efter det i saadant Fald brugelige Afdrag og ivrigt under Jagttagelse af de ovenanførte Forskrifter, at fordele, tilligemed det, som, naar Enhver har faaet sin Part, maatte blive tilovers af Partehvalen, mellem de Baade, som maatte være ankomne, efterat Sysselmanden har begyndt Beregningen. Men det Overskud, som endnu derefter kunde haves, bortsælges af Sysselmanden til den Højstbydende, og Indtægten henlægges til en oeconomisk Fond for Færøe Amt.

Paa samme Maade forholdes med de Hvaler, som i de 2 første Dage efter Dræbningen opflyde eller opfiskes i selve Hvalvaagen, dog efter Fradrag af en billig Erstatning til Finderen.

§ 30.

De Hvaler, som efter den i Slutningen af forrige § ommeldte Tid antræffes, tilfalde derimod, efter det i saadant Fald brugelige Afdrag, Finderen.

*Tillisch amtmaður grundlegði í § 29 í Grindareglugerðini frá 1832 ein grunn, Færø Amts økonomiske Fond, hvørs endamál var at savna pening til ymisk moderniseringsátøk, sum komu øllum samfelagnum til gagns.*

farin til „Fordeel snart for en snart for en anden offentlig Stiftelse eller Kasse". Ístaðin skeyt hann upp at seta henda pening í ein grunn. Grundgevingin var at

> da vistnok en økonomisk Fond, bestyret paa en hensigtsmæssig Maade, vilde kunne stifte særdeles megen Nytte for hele Landet, saa har jeg ikke troet, at burde lade denne Leilighed til at lægge Grunden til et saadan Fond hengaae ubenyttet, saamegetmindre, som det Overskud, hvorom her Talen er, egentlig tilhører Almuen som har drevet og dræbt Grinden, men alene paa Grund af dets Ubetydelighed i Forhold til Eiernes Mængde, ikke kan komme til almindelig Fordeling; det synes derfor ogsaa mest passende at det anvendes paa en saadan Maade, som kan være til mest Gavn for det Almindelige.

Um hugskotið fekk undirtøku, skuldi Tillisch seinni koma við uppskoti um, hvussu grunnurin og peningurin í honum best kundi nýtast[73]. Uppskotið vann frama, tí tað var óbroytt við í grindareglugerðini, sum varð kunngjørd 1. november 1832.

Rentukamarið tók ikki undir við uppskotinum hjá Tillisch um, at Landhuusholdningsselskabet skuldi stjórna grunninum, tí tað helt, at inntøkurnar vóru óvissar, og tí vildu teir heldur hava, at fyrstu árini fóru til at savna pening í grunnin. Tí skuldi amtmaðurin seta peningin í Kongliga handilin, so hann „saasnart mueligen bliver giort frugtbringende." Kamarið vildi eisini hava

73 Uppskot Tillischs til grindareglugerð dagfest 11. mai 1831. Her er avskriftin hjá John F. West, sum er í sonevndu Grindabókini hjá honum, har ymisk skjøl viðvíkjandi grind eru savnað, nýtt. Grindabókin er á Tjóðskjalasavninum.

*Hans Niclasen í Koltri fekk í 1835 virðisløn frá Landhuusholdningsselskabet for Færø Amt fyri at hava virkað 7 lispund av klippfiski. (Mynd: Danmarks Nationalmuseum)*



eina árliga frágreiðing um grunnin og frágreiðingar um tey framstig, sum Landhuusholdningsselskabet gjørdi[74].

Sostatt eydnaðist ikki at knýta inntøkurnar í Færø Amts Økonomiske Fond til Landhuusholdningsselskabet, og tað mundi vera eitt vónbrot fyri Tillisch, tí uttan pening var torført at stuðla nýggjum átøkum, og nú hevði felagið bara tann peningin, sum limirnir lótu tí, at arbeiða við.

Landhuusholdningsselskabet helt kortini áfram við sínum virksemi, og lítið er at ivast í, at møguleikarnir í einari komandi fiskivinnu javnan vóru til umrøðu har. Felagið gjørdi av at taka stig til at stuðla klippfiskaframleiðslu[75], og í roknskapinum hjá felagnum fyri 1835 eru tvær virðislønir latnar fyri slíka framleiðslu. Onnur var á 3 ríkisdálar og 3 markar, sum Hans Niclasen í Koltri fekk fyri at hava framleitt 7 lispund av klippfiski. Hann fekk sostatt 3 markar fyri lispundið. Hin varð latin Joen Mikkelsen á Eiði og var upp á 11 ríkisdálar og 3 markar. Tí hava eiðismenn helst virkað 23 lispund av klippfiski summarið 1835[76]. Tað er ikki eydnast at finna fram til, um felagið lat aðrar virðislønir enn

74 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra G, bræv nr. 626. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannin dagfest 16. august 1834.

75 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 137. Bræv frá Pløyen amtmanni til Rentukamarið dagfest 26. februar 1839.

76 SA. Den Administreende Direktion for den Kgl. Færøske Handel: Hovedbøger. Strømø 1830-1836.

hesar báðar, og ein orsøk til tess kann vera, at øll orkan varð løgd í at fáa smíðað eitt deksfar til reka fiskivinnu við.

### 7.2.1 „Det færøiske Fiskerfartøj" skuldi slóða fyri

Størsta takið hjá felagnum var at stuðla byggingini av einum deksfari, sum í fyrstuni bara varð nevnt „Det færøiske Fiskerfartøj". Tað var eitt felag, sum Tillisch hevði stovnað, sum fór undir hesa verkætlan í 1834. Í høvuðsbókini hjá handlinum sæst, at Tillisch setti 10 ríkisdálar í felagið, og sama dag fekk felagið 100 ríkisdálar frá Landhuusholdningsselskabet. Áðrenn árið var úti, høvdu Hunderup sorinskrivari og Nolsøe handilsforvaltari eisini sett hvør sínar 10 ríkisdálar í felagið. Árið eftir settu Krebs lækni og Kaarsberg prestur eisini hvør sínar 10 ríkisdálar í felagið,[77] og sambært Páll Nolsøe vóru Schrøter prestur, Struer prestur og Poul Joensen snikkari í Nólsoy eisini partaeigarar (Nolsøe 1984: 242)[78].

Ein av skiparunum hjá Einahandlinum lovaði at hjálpa til við at keypa tilfar til bátin. Jensen skipari kom aftur til Keypmannahavnar 7. september 1834. Hansara uppgáva var at keypa tilfar til „bygning af Fartøi til Fiskerie for adskillige Indbyggeres Sammenskud." Hann hevði fingið 374 ríkisdálar 78 skillingar, sum handilin skuldi hava aftur, men tilfarið varð flutt til Føroya frakt- og avgjaldsfrítt[79].

Sambært Páll Nolsøe strektu nólsoyingarnir Poul og Tummas Joensen kjølin í Havn, helst í Rættará (Nolsøe 1984: 242), men í bókunum hjá handlinum sær út til, at nógv av arbeiðinum er gjørt í Nólsoy. M.a. var eikitræ fyri 17 ríkisdálar og 2 markar flutt úr Dali til Nólsoyar[80].

Skonnartin var liðug á sumri 1836, og 14. juli vóru sorinskrivarin og sýnsmenninir Hans Debes og Jákup Johannesen umborð og máldu hana upp. Longdin var 39 ¾ fót, breiddin 11 ¾ fót, og sýnsmenninir fingu hana at vera 8½ kommerselest ella 17 tons (Nolsøe 1984: 244). Skonnartin fekk navnið „Nolsøe", og ein orsøk til tað var helst, at ætlanin var, at nólsoyingar skuldu hava hana, tá ið hon var liðugt bygd. (Degn 1929: 33).

Alt bendir á, at „Det færøske Landhuusholdningsselskab" var hildið uppat at virka, áðrenn skonnartin varð liðug, tí einki sæst aftur til felagið. Um tað er niðurlagt, ella keldurnar um tað bara eru torførar at fáa eyga á, dugi eg illa at taka støðu til. Tað hevði í øllum førum verið spennandi uppgáva at funnið fram meira um søguna hjá hesum felagnum, tí sjálvt um søgan er stutt, so er felagið eitt greitt prógv um, at amtmaðurin í sínum arbeiði at menna landið hevði roynt at skapt eitt forum av upplýstum fólki at stiðja seg til og ráðføra seg við.

---

77 SA. Den Administreende Direktion for den Kgl. Færøske Handel: Hovedbøger. Strømø 1830-1836.

78 Á somu síðu sigur Nolsøe, at Landhusholdningsselskabet í Danmark stuðlaði við 100 ríkisdálum, men tað er ein misskiljing.

79 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve. Litra G, bræv nr. 692. Bræv frá Handilsstjórnini til amtmannin dagfest 19. september 1834.

80 SA. Den Administreende Direktion for den Kgl. Færøske Handel: Hovedbøger. Strømø 1830-1836.



*Í bókunum hjá Einahandlinum varð skipið bara nevnt „Det færøiske Fiskerfartøi“.*

Í álitinum, sum kom burtur úr fundunum millum Handilsstjórnina og Tillish veturin 1835-36, og sum vit venda aftur til eftir henda partin, kom til sjóndar, at tiltrúgvin upp á fiskivinnu sum eina framtíðar vinnu í Føroyum var minkað, men av tí, at eitt deksfar var í gerð, var hesin møguleikin tikin við í fyriskipanina, og punkt fýra í henni ásetti:

> At der til Fuldførelse af et i Thorshavn for Tiden under Bygning staaende Dæksfartøi maa af Handelens Kasse forundes Vedkommende et rentefrit Laan af 500 Rd Sedler, imod at dette tilbagebetales efter 2 Aars Forløb med 1/10 deel aarligen i de næstfølgende 10 Aar, og imod at for Haandgives Sikkerhed i Fartøiet, samt at der for andre af Indbyggerne paa Færøerne maae gives Haab om ligeledes at kunne erholde Laan i lige Øiemed.[81]

Við hesari avgerðini fingu Tillisch og hinir partaeigararnir helst møguleikan at smíða skonnartina, sum nú varð nevnd „Nolsøe“, lidna, men tað uppaftur meira týdningarmikla var í eykasetninginum, har latið varð upp fyri, at allir, sum høvdu mót uppá at fara undir at fáa størri fiskifar til vega, fingu møguleikan at lána 500 ríkisdálar rentufrítt. Tað almenna hevði nú eisini fíggjarliga ein týðandi leiklut.

Tá ið Christian Pløyen fúti var í Keypmannahavn summarið 1836, boðaði hann Handilsstjórnini frá, at ymiskur reiðskapur til deksbátin, sum stóð í gerð í Føroyum, ikki var komin fram við várskipunum. Møguliga var bíleggingin ikki nóg greið, men brúk var fyri einum akkeri á átta lispund, 30 favnum av ketu, 50 alin av mellemdug og einari kabús úr stoypijarni at hava standandi á dekkinum[82].

81 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve. Litra J, bræv nr. 121. Forordning frá Rentukamarinum dagfest 20. apríl 1836.

82 TSS. Fútasavnið. Kopibók fútans 1830-1837. Brøv skrivað í Keypmannahavn 1836, bræv nr. 1. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 26. mai 1836.

Henda veturin varð deksbáturin liðugt bygdur, men „Nolsøe“ fiskaði bara í 1837, og teir fingu bara 138 pund av ráfiski og 64 pund av klippfiski. Eftir tað sigldi skonnartin fyri tað mesta farm millum handlarnar hjá Kongliga einahandlinum og gjørdi einstakar túrar til Hetlands eftir taksteini (Degn 1929: 34).

„Nolsøe“ lá m.a. í Lerwick 7. juli 1839, tá ið Pløyen kom aftur av ferð síni í Skotlandi. Hon lá har millum fleiri niðurlendskar sildabátar, og tað var ein frægd hjá Pløyen at síggja eitt føroyskt skip millum hini. „Nolsøe“ var komin eftir skifursteini, og Pløyen nýtti høvið at skriva heim til familjuna í Føroyum. Hann var hugtikin av teimum føroyingunum, ið ongantíð høvdu smíðað annað enn bátar, men sum nú høvdu bygt eitt skip á 8 commerselestir (Pløyen 1966: 111).

3. januar 1841 rak skonnartin á land undir hospitalinum í Havn og gjørdist vrak. (Degn 1929: 34) Nolsøe handilsforvaltari varð lagdur undir illgruna fyri at hava skylduna av hesum óhappinum, men hann greiddi sjálvur frá, at hann hevði givið loyvi til, at eigararnir kundu fortoya skipið í jarnketurnar, sum handilsskipini nýttu, men tann fortoyingin var helst ikki gjørd nóg væl (Nolsøe 1841: 28). Nolsøe helt, at talan var um „patriotiske Foretagender“, men ósemja millum eigararnar hevði við sær, at neyðugar umvælingar ikki vórðu gjørdar, og tí kundi skonnartin ikki nýtast til farmaflutning fyri handilin, og endin gjørdist, at hon fórst (Nolsøe 1841: 29).

Tann skonnartin, sum upprunaliga varð lýst sum „Det færøiske Fiskerfartøi“, kom ongantíð at gera so nógv við fiskivinnuna, sum upprunaliga ætlanin var, ta stuttu tíð hon var til. Men eitt týdningarmikið úrslit av hesi verkætlanini var, at hon, helst tí fremstu embætismenn í landinum vóru partaeigarar, fekk latið upp fyri møguleikanum at læna pening rentufrítt til at byggja ella keypa størri fiskifør fyri. Í grein fýra í lógini frá 20. apríl 1836 er henda verkætlanin ítøkiliga nevnd, men síðani letur greinin upp fyri, at aðrir eisini kundu nýta sama møguleika. Fleiri tóku av møguleikanum, og tí er talan um týdningarmikið stig á leiðini at gera føroyska samfelagið til eitt fiskivinnusamfelag.

Eitt annað týdningarmikið úrslit var, at Pløyen lærdi, hvussu torført tað var at fáa slíka ætlan at bera til. Í 1839 skrivaði hann, at „det er et saare utaknemmeligt og besværligt Arbeide at være Skibsrheder her paa Færøerne“. Hann tosaði av royndum og var vónbrotin av, at henda vælmeinta royndin at seta gongd í føroyska fiskivinnu, „kun har tjent til at betyde Færingernes Mistillid til deres egen Duelighed i denne Henseende.“ Øll, sum høvdu fylgt við gongdini hjá hesum skipinum, vóru sannførd um, at tað undir verandi viðurskiftum og „med Færingerne saaledes, som de ere,“ fór at verða ógjørligt at lyfta fiskivinnuna upp á eitt hægri stig. Skuldi tað henda, var neyðugt við stórum og grundleggjandi broytingum[83].

Sostatt kann staðfestast, at royndin hjá Tillisch at fremja broytingar við at fáa at føroyingar at taka við nýggja liberala hugburðinum var miseydnað. Felagið

83 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 137. Bræv til Rentukamarið dagfest 26. februar 1839.

„Landhuusholdningsselskabet for Færø Amt“ var dottið niðurfyri, og stóra ætlanin hjá felagnum at stuðla einum nýggjum fiskifari var eisini kollsigld, og hon hevði sambært Pløyen virkað beint øvugt av ætlanini, tí hon fekk heldur føroyingar at missa trúnna upp á nýggju møguleikarnar heldur enn at taka teir til sín. Leggjast mátti á annan bógv, og tað merkti, at tað almenna skuldi ganga á odda at fremja broytingar.

## *7.3 Tillagingar í Einahandlinum í 1834*

Umframt tær ítøkiligu royndirnar at fáa gongd á eina fiskivinnu, staðfesti Tillisch, at tillagingar vóru neyðugar í Einahandlinum, um nøkur vón skuldi vera fyri nakrari fiskivinnu við deksførum. Høvuðsspurningurin var at fáa prísirnir at hanga saman. Í fyrstu syft hendi eingin broyting í prísinum á saltfiski, men handilin lækkaði longu í 1834 takstprísin á tunnum úr 3 ríkisdálum til 2 ríkisdálar 32 skillingar. Afturfyri sluppu kirkjur og aðrir stovnar ikki longur at lána tunnur, sjálvt um tær vóru afturbornar óskaddar. Tað gramdi Tillisch seg um í brævi til handilsstjórnina 10. mai 1834, har hann endurtók, at handilsforvaltarin var ov einaráðandi.[84] Sjálvt um tað ikki verður sagt beinleiðis, so tykist tað sum, at handilsforvaltarin og embætismenninir hava havt torført við at samstarva, og at tað tí var ógvuliga treyðugt, at handilsforvaltarin vildi gera broytingar, sum kundu vera eini komandi fiskivinnu at frama. Handilsstjórnin vildi ikki áleggja forvaltaranum at broyta sína avgerð, og stjórnin helt heldur ikki, at almennir stovnar skuldu hava øðrvísi treytir í handlinum enn aðrir keyparar. Tað einasta, teir vildu ganga við til, var at lata stovnunum tunnur einaferð, sum stovnurin so kundi brúka aftur, hvørja ferð hann hevði brúk fyri meira kálki[85]. Soleiðis royndi handilin at vinna innaftur við aðrari hondini tað, sum hann læt við hinari.

Tilmælini um broytingar í Einahandlinum hava helst rakt við onkustaðni, tí 10. desember sama ár vóru broytingar í prísum og farmagjøldum kunngjørdar. Avgjørt varð, at bøkur og prentaðir lutir og fræ av ymiskum slag skuldu seljast í Einahandlinum fyri innkeypsprís. Eitt avgjald upp á 10 % skuldi leggjast upp á bílagdar vørur, sum svaraðu til vørur á takstlistanum, men fyri allar aðrar vøru skuldu 1 ríkisdáli og 64 skillingar latast fyri hvørt tunnupláss í farmagjaldi. Fyri sendingsgóðs av landinum skuldi 25 % leggjast oman á prísin á vørum, sum svaraðu til tær, sum handilin tók ímóti, og 1 ríkisdáli og 64 skillingar gjaldast fyri hvørt tunnupláss, um talan var um aðra vøru.

Einki sæst til, at nakað varð gjørt við tilmælini hjá amtmanninum um at gera fiskivinnuna møguliga. Tvørturímóti avgjørdi handilsstjórnin at gera framleiðsluna av ullvørum enn meira lokkandi, tí prísásetingin á ullvørum varð broytt, soleiðis

84 TSS. Færø Amt. Kopibók M, bræv nr. 61. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 10. mai 1834.

85 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra G, bræv nr. 538. Bræv frá Stjórnini fyri kongliga grønlendska og føroyska handilin til amtmannin dagfest í Keypmannahavn 7. juni 1834.

at handilin keypti ullvørur fyri 75 % av miðalprísinum á marknaðinum árið fyri. Tað var ein hækking í prísunum á hesum vørum, tí frammanundan gav handilin bara 66 ⅔ % av marknaðarprísinum árið fyri. At enda komu fínar ullvørur eisini á listan við takstvørum undir somu treytum sum aðrar ullvørur[86]. Í brævi frá 8. januar hevði Tillisch amtmaður mælt til at broyta flutningskostnaðin og til at taka fínar ullvørur á takstlistan, og at tað varð gjørt, er eitt greitt tekin um, at hugsanin hjá amtmanninum hevði stóra ávirkan á førda handilspolitikkin, men Einahandilin tók eingi stig til at stuðla einari komandi fiskivinnu.

## *7.4 Handilsspurningurin aftur til viðgerðar*

Meðan „Det færøiske Fiskefartøj“ stóð í gerð, varð spurningurin um frían handil í Føroyum javnan umrøddur. 27. juli 1835 skrivaði Tillisch til Rentukamarið um, at ta síðstu tíðina hevði verið nógv umrøtt, at tað hevði verið gagnligt, um handilin í Føroyum varð fríur. Í hesum kjakinum var enntá sagt, at føroyingar „*eenstemmigen*“ ynsktu sær fríhandil, men hetta var als ikki so sambært Tillisch. Tvørturímóti hevði hann, stutt áðrenn hann fór til Danmarkar, fingið hópin av bæði skrivligum og munnligum áheitanum um at mótarbeiða øllum slíkum ætlanum.[87]

Eitt dømi um eina slíka áheitan var eitt skriv frá Vága sýslumanni, sum hann skrivaði eftir at hava verið á rundferð í sýsluni. Hann greiddi frá, at stór ónøgd var við Einahandilin, og at vantandi vøra og vánalig góðska vóru meginorsøkirnar. Hann visti at siga, at fólk vóru blivin sjúk av bygginum í handlinum, so heilar bygdir kravdu nú, at tær sluppu at keypa neyðsynjarvørur frá fremmandum. Hann bað amtmannin vera á varðhaldi, nú hesar hugsanirnar vóru kveiktar, og gera sítt til, at handilin fór at virka meira nøktandi[88].

Tillisch helt heldur ikki, at tað „for øjeblikket“ var skilagott at frígeva handilin. Orsøkin var, at allir vinnuvegir vóru so illa riknir fyri tíðina, at tað var ivasamt, um úrtøkan var nóg stór til at tryggja, at so frægt av kapping kom, at íbúgvarnir kundu kenna seg vísar í ikki at enda í klórnum á einstøkum keypmonnum. Harumframt var vandi fyri, at sjálvt neyðsynjarvørur fóru at vanta í tey árini, tá úrtøkan var vánalig, og fólk ikki høvdu møguleika at gjalda fyri vørur. Triðja grundgevingin var, at føroyingar enn ikki vóru so væl upplýstir, at teir fóru at fáa nakra nyttu av nýggja handilsforminum.

Hann helt kortini, at ábøtur kundu gerast á verandi handil, serliga so at sleppast kundi undan torføru ferðingini til handilin, og so áttu tiltøk eisini at

86 SA. Rentukamarið. 1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland) Her er álitið, sum varð gjørt í sambandi við resolutión 20. apríl 1836, nýtt sum kelda. Tað hevur No 163 í hesum kassanum.

87 TSS. Færø Amt. Kopibók O, bræv nr. 10. Bræv til Rentukamarið dagfest 27. juli 1835.

88 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra G, bræv nr. 452. Bræv frá Zachariassen sýslumanni til amtmannin dagfest í Sandavági 2. mai 1834.



*Havnin í 1830-árunum. (Mynd: Museum for søfart)*

verið gjørd til at fyrireika fríhandilin. Í tí fyrra liggur hugskotið um úthandlar, tað seinna „bør skee deels ved at ophjælpe de forskiællige Næringsveie, og deels ved at bringe Indbyggerne i nærmere forbindelse og berøring med fremmede."

Hann helt, at úthandlar áttu at komið í Norðuroyggjum og í Suðuroy. Í báðum støðum vóru góðar havnir, har handilsskip kundu koma, men annars gjørdi hann seg ikki klókan uppá, hvussu hesir handlar skuldu skipast. Hann viðmerkti bara, at ein fyrimunur við hesum úthandlum var, at „naar Landet engang i Tiden maatte blive modent til at modtage Frihandels Fordele, vilde sikkres en fordelagtigere Afsætning, naar de laae paa forskellige Steder i Landet, end naar de som nu alle laae samlet i Thorshavn."

Um tað síðsta nevndi Tillisch, at fremmand fiskiskip, og tá serliga hetlendingar, síðstu árini javnan komu at spyrja um møguleikan at keypa brennivín og tubbak. Hann hevði noktað fyri tí higartil, tí handilin var bara forsýnaður við vørum til føroyingar, men um man nú fyrireikaði seg til henda handilin, so var tað til fyrimuns fyri Einahandilin, men tað kundi eisini givið føroyingum møguleika at handla við øllum teimum vørum, sum ikki stóðu á takstinum sum returvøra. Hann endaði brævið við at siga, at tíverri hevði stutta tíðin í Keypmannahavn ikki loyvt honum at greina málið gjølligari, men hann helt seg skula skriva, áðrenn hann nú fór heimaftur[89].

Brævið frá Tillisch gjørdi, at Rentukamarið 15. august avgjørdi at biða hann vera í Keypmannahavn til komandi vár, so at hann kundi luttaka í viðgerðini av ymiskum málum, sum vóru viðkomandi fyri Føroyar. Tillisch fekk hetta at

89 TSS. Færø Amt. Kopibók O, bræv nr. 10. Bræv til Rentukamarið dagfest 27. juli 1835.

vita í brævi 29. august. Rentukamarið álegði Handilsstjórnini at koma saman at fundast við Tillisch, so ofta sum neyðugt var, fyri at viðgera uppskotið hjá Tillisch og møguliga onnur mál, sum komu fram, sum kundu gagna handli og landi. Tað úrslitið, sum teir komu fram til, skuldi skrivast í eitt samlað álit og latast Rentukamarinum aftur[90].

Longu 20. august, tað vil siga, áðrenn hann fekk formligu boðini um at vera við í viðgerðini av málum Føroyum viðvíkjandi, sendi hann boð til Føroya, har hann bað Pløyen fúta, Hunderup sorinskrivara, Nolsøe handilsforvaltara og Schrøter fyrrverandi prest koma við sínum hugsanum um málið. Tað skuldu teir gera sum skjótast, tí hann vildi hava álit frá teimum við fyrsta skipi aftur til Danmarkar[91].

3. september skrivaði Tillisch til Handilsstjórnina um hetta arbeiðið. Tillisch gjørdi í brævi sínum vart við, at tað helst ikki tænti nøkrum endamáli at brúka nógvar pengar upp á at bøta um handilin, tá hann kortini um fá ár fór at blíva fríur, tí tað fór at merkja stórt tap, og tað fór at leggja forðingar fyri fría handlinum. Tí var hann nú ikki so heitur fyri úthandlum, sum hann hevði verið. Í brævinum skrivaði Tillisch, at

> Jeg antager derfor, at de Conferencer, som jeg skal have den Ære at deeltage i med den ærede Direction, fornemmelig bør gaae ud paa at udfinde en Maade, hvorpaa Handelen kunde frigives saaledes, at Indbyggerne kunde komme til at nyde en frie Handels Fordele, og de af Frigivelsen befrygtede Ulemper dog forekommer eller i al Fald giøres mindre betænkelige, og under den Forudsætning, at man overhovedet ikke saa nøie bør tage Hensyn til det øieblikkelige Tab, som vilde følge af en forandret Handelsform, naar Forandringen blot i sine følger maa antages at være til Fordeel saavel for Færøe som Moderladet, tillader jeg mig derfor her at fremsætte nogle Forslag til Opnaaelsen af det angivne Øiemed.

Tillisch helt ikki, at neyðugt var at taka atlit til „Næringsveienes Ufuldkommenhed“ og vantandi upplýsing millum fólk, tí tað var júst Einahandlin, sum helt hetta „in Status Quo“, og tað fór neyvan at bera til at broyta hesi tingini, fyrr enn handilin varð fríur. Hann helt, at einasta treyt fyri, at handilin kundi frígevast, var at landið var tryggjað ímóti at mangla korn. Rættast var tí at hava eina almenna korngoymslu, sum kundi latast upp, tá tørvur var á tí. Við slíkari goymslu bar eisini til at forða fyri, at prísirnir fóru alt ov langt upp. Korngoymslan kundi fíggjast við møguligum yvirskoti av søluni av handlinum. Tá fleiri handilsmenn vóru komnir í Føroyum, kundu teir fáa álagt skyldu at hava korngoymslu, og so kundi tann almenna leggjast niður. Í øðrum lagi, um goymslan ikki vann frama, kundu spekulantar fáa loyvi at koma til landið ávísar tíðir á árinum, tí so fekk

90 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra J, bræv nr. 39. Bræv frá Rentukamarinum til Tillisch dagfest 29. august 1835.

91 TSS. Færø Amt. Kopibók O, bræv nr. 16. Bræv til Pløyen, Hunderup, Nolsøe og Schrøter dagfest 20. august 1835.

Kongligi handilin sama samband við teir, sum føstu handlarnir í Íslandi høvdu til spekulantarnar har. Tað fór at kosta handlinum so nógv, at tað var ivasamt, um hann kundi yvirliva tað[92].

Stórur munur er á hugburðinum hjá Tillisch um, hvussu fram skuldi farast, í hesum báðum brøvunum frá ávikavist 27. juli og 3. september 1835, tí meðan hann í fyrra brævinum helt, at fleiri fyrireikingar skuldu gerast, áðrenn fríhandil kundi koma, so var niðurstøðan í seinna brævinum, at eingin broyting kundi koma, fyrr enn Einahandilin var avtikin. Hvør orsøkin er til hesa hugburðsbroyting er ilt at siga nakað um, men hugsandi er, at tað kann hava samband við, at alt ikki gekk eftir vild í ætlanini við Landhuusholdningsselskabet.

### 7.4.1 Pløyen og Hunderup mæla til at menna fiskivinnu

Av teimum fýra, sum Tillisch bað skriva álit um handilsspurningin, er tað bara eydnast at finna tvey svar. Svarini hjá Nolsøe forvaltara og Schrøter havi eg ikki funnið, men tey hjá Pløyen fúta og Hunderup sorinskrivara eru áhugaverd og týdningarmikil skjøl í fiskivinnusøgu Føroya, tí teir vóru báðir samdir um, at ein ment fiskivinna var ein avgerandi lutur í at gera samfelagið klárt til fríhandil.

Pløyen fúti svaraði 29. september 1835, og í svari sínum vísti hann á, at føroyingar vóru føddir sjómenn, og landið var soleiðis háttað, at tað var neyðugt at fáa burtur av havsins ríkidømi. Sum var, fóru føroyingar út á stóra Atlantshavið í smáum opnum bátum, og tí høvdu teir „yderst let ville kunne dannes til at fare med Skib." Fronsk, niðurlendsk og bretsk skip fyltu seg við fiski, meðan føroysku bátarnir ikki rukku út á stóru bankarnar.

Tað var særandi hjá føroyingum at síggja, men um myndugleikarnir hjálptu teimum at fáa fatur á slíkum fiskiførum, fór ein sjófarandi stætt skjótt at vaksa, og teir neyðugu nautisku førleikarnar fóru „med deres særdeles lykkelige Naturanlæg" at verða lættir at læra. Pløyen skeyt upp, at 4 ella 5 sluppir vórðu sendar til Føroya við skipara og einum manni afturat. Teir skuldu so fáa føroyska manning, og tá fór tað at verða so skjótt, at føroyska manningin gjørdist før fyri at fara við sínum egnu fiskiførum.

Tillisch var ikki so fegin um almennan stuðul, men Pløyen hugsaði øvugt, tí hann helt, at „Handelsdirektionen maatte begunstige den begyndende Søefart... med enhver billig Lettelse." Ítøkiliga nevndi hann, at handilin kundi lata tunnur til innkeypsprís og halda prísin á salti niðri, tá hesar vørur skuldu brúkast til fisk. Tað kundi eggjað teimum til, sum lærdu seg sjómansskap fyri almenna rokning. Pløyen vísti á, at handilin hevði givið stórt yvirskot síðstu árini, og tí helt hann, at yvirskotið, „Som de selv, med deres møisommelige Arbeide, have erhvervet, maa blive anvendt til deres Forædling." Um kongur ikki gekk við til tað, so fór at verða torført at gera nakað munagott at fyrireika íbúgvarnar upp á fríhandilin.

92 TSS. Færø Amt. Kopibók O, bræv nr. 28. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 3. september 1835.



*Pløyen gjørdi sær í 1835 sum fúti fleiri hugsanir um eina komandi fiskivinnu í Føroyum í longum áliti til Tillisch amtmann.*

Pløyen hevði eisini spurt franskar fiskimenn um, hvør vøra var tann rætta, um tað var stokkfiskur, saltaður fiskur ella klippfiskur, men hann setti seg ikki føran fyri at taka støðu til tað. Franskmenninir søgdu, at ein tunna av saltfiski fór fyri 60 til 80 frankar, og tað var „en uskjøn Pris“ samanborið við tað, sum føroyingar fingu.

Niðurstøðan hjá Pløyen var:

> Jeg anfører disse Omstændigheder her for at vise, hvilke Fordele der, efter min Overbevisning vilde kunne benyttes, naar Færingerne besidde de fornødne Midler og Kundskaber, naar en deel af dem blev vant til udelukkende at befatte sig med Søefarten, og de ikke, sum nu, maatte dele deres Tid og Opmærksomhed imellem Agerdyrkning, Fædrift og Fiskeri paa Baad, Færingernes trende Næringsvei, der netop af den Grund endnu aldeles er i dens Barndom[93].

Hunderup sorinskrivari svaraði 8. oktober 1835. Hann vísti á, at eingin ivaðist í, at tað var fiskivinnan, sum hevði gjørt, at Ísland hevði fingið so nógv burtur úr fríhandlinum, og Føroyar áttu landafrøðiliga at vera líka væl egnaðar til slíka vinnu sum Ísland. Skuldi handilin í Føroyum verða fríur, var umráðandi, at kapping var millum ymiskar handilsfyritøkur, og tað kundi bara tryggjast við øktum vinnuvirksemi. Tí var tað ein almenn uppgáva at menna verandi vinnur og stuðla nýggjum vinnum. Hunderup býtti sítt tilmæli upp í tríggjar partar. Ein var um landbúnað, ein um seyð og neyt, og so var ein um fiskivinnu.

93 TSS. Fútasavnið. Kopibók fútans 1830-1837, bræv nr. 42 í 1835. Bræv frá Pløyen fúta til Tillisch amtmann dagfest 29. september 1835.



*Hunderup sorinskrivari ivaðist í sínum langa áliti ikki í, at føroyingar vildu sleppa at fiska við skipum.*

Hunderup vísti eins og Pløyen á, at føroyingar vóru sum skaptir til sjógvin, men Einahandilin hevði hildið honum niðri í einum „Afhængigheds og Umyndigheds Tilstand“, sum hevði steðgað øllum framburði. Hesir eginleikar tyktust tó at kunna grundgeva fyri, „at Fiskeriet, drevet i det Store, maatte kunne blive en Hovedkilde til Landets Velstand, da de øvrige betingelser for et Fiskeri ikke mangle.“ Hunderup vísti á, at nógv fremmand skip fiskaðu á føroysku bankunum, sum vanliga gjørdu tveir túrar hvørt summar, og í nøkrum førum tríggjar. Tá skip við heimahavn 300 míl burtur frá bankunum kundu fáa vinning burturúr, so kundu føroysk skip eisini, tí tey vóru bara nakrar tímar burturi.

Føroyingar sóu sambært Hunderup sjálvir henda møguleikan, og „Ønsket at drive Fiskeriet med egne Skibe er derfor almindeligt og levende for de fleste.“ Hunderup greiddi frá útróðrinum og vísti á, at tað ikki var høvuðsvinna hjá vanliga føroyinginum, men hóast tað vórðu 500 til 600 skippund av turrum fiski útflutt. Hunderup virdi føroyingar fyri hetta, og tað gjørdi eisini, at hann ikki ivaðist í, at „saa stor Udholdenhed og Fliid“ fóru at tryggja, at ein komandi fiskivinna við størri førum fór at eydnast væl.

> Men skal dette opnaaes maae Beboerne nødvendigen, ved Understøttelse paa en eller anden Maade, sættes istand til at forskaffe sig Skibe, da forfatningen ingenlunde er saaledes, at der selv ved Sammenskud kunde tilveiebringes en saa betydelig Sum her i Landet, som dertil vilde udfordres.

Greiðari ber illa til at grundgeva fyri, at neyðugt var við almennum stuðuli, um gongd skuldi fáast á fiskivinnuna. Hunderup vónaði, at tiltøk vórðu sett í verk,



*Longu sama ár, sum Rentukamarið avgjørdi at gera nakrar broytingar í handlinum í Føroyum, læt tann fyrstu úthandilin upp. Hann var á Tvøroyri. (Mynd: Tjóðsavnið)*

sum kundu gera íbúgvarnar førar fyri at keypa sær skip, og at handilin fór at taka ímóti saltfiski og klippfiski[94].

### 7.4.2 Viðgerðin í Handilsnevndini

Eftir at Tillisch og Handilsstjórnin saman høvdu viðgjørt spurningin um føroyska handilin veturin 1835-36, skrivaði Rentukamarið eitt álit 19. apríl 1836. Í álitinum gjøgnumgekk kamarið, hvussu fríhandil í Føroyum fyrr hevði verið umrøddur. Tað helt, at endamálið í resolutiónini frá 21. september 1821 um á ymiskan hátt at fyrireika føroyingar til at taka við fríum handli, alla tíðina hevði verið hildið fyri eygað, og at tær broytingarnar, sum vóru hendar í handlinum í 1821-23 og í 1834, allar høvdu gjørt sítt til at fyrireika føroyingar, soleiðis at teir í dag

> erkjende ogsaa fuldkomment disse Bestræbelser, for at gjøre dem det nuværende Handelsforhold saa lidet trykkende som mueligt, og Kammeret nærer det Haab, at disse Skridt ikke skulde være gjorte forgjæves, men at de fremdeles, ligesom hidtil, ville tjene til at fremme en større Vindskibelighed, en deraf følgende større Production og en høiere Cultur hos Færingerne, som saaledes gjøre dem skikkede til at nyde Fordelene af en fri Handel.

Rentukamarið ásannaði, at einki var komið burtur úr tilmælunum um at lata

94 TSS. Sorinskrivarin. Kopibók 1833-1839. Bræv nr. 151. Bræv sent til Tillisch amtmann dagfest 8. oktober 1835.

úthandil upp í Suðuroy og at stuðla bygging ella keypi av deksførum til fiskiskap og farmaflutning. Orsøkin var, at suðuringar vóru samdir um, at teir ikki vóru áhugaðir at reka ein úthandil fyri egna rokning, og tí varð avgerðin um úthandil útsett 29. mai 1824, og eingin umsókn var komin inn um at fáa stuðul til deksfør. Tí var útróðurin framvegis álitið, og tí var fiskur sum handilsvøra framvegis „en Ubetydelighed".

Nú vóru konjunkturarnir góðir fyri føroyska handilin, og tí lá væl fyri at taka málið uppaftur, tá ið Tillisch amtmaður bar tað fram. Nevndin hevði viðgjørt tey fýra álitini úr Føroyum, og teir vóru sambært Rentukamarinum allir samdir um, at tað var vanliga ynskið í Føroyum, at handilin framhaldandi skuldi rekast av kongi, og at handilin skuldi halda fram, so leingi sum framleiðsla og mentan ikki vóru komin upp á eitt hægri stig, enn tey nú vóru á. Tí var tað skilabesta framhaldandi at arbeiða fyri at fyrireika landið til eina støðu, har „fri Handel kunde med Held for Indbyggerne tillades." Javnvágsfellan skuldi varðveitast.

Fyrireikingarnar til fríhandil vóru í fýra punktum. Tað fyrsta var at gera eina útskifting av jørðini og at fremja ábøtur á seyða- og neytahald, síðan komu „Fiskeriernes Fremme" og úthandlar, og at enda kom eitt ynski um at læra ungar føroyingar sjómansskap, bókhald og vørukunnleika. Hetta síðsta og tað við jarðarbrúkinum skuldi kannast nærri, meðan hini bæði vóru endurtøkur av tí, sum hevði verið frammi í 1821.

Av tí, at einki ynski var um tað í Føroyum, og tí at embætismenninir mæltu frá tí, kom fríhandil ikki upp á tal, tí fyri tað almenna var tað eingin trupulleiki at halda fram við Einahandlinum, tá ið hann í fleiri ár hevði givið munandi yvirskot. Í viðgerðini var óttin fyri, at føroyski handilin var so lítil, at hann ikki hóskaði seg til frían handil, komin fram, eins og tað var ein vansi, at oyggjarnar lógu so avsíðis. Hugskotið hjá Tillisch um eina almenna korngoymslu fekk onga undirtøku, tí slíkt fór at kosta kongliga kassanum ov nógv. Nevndin tók heldur ikki undir við, at spekulantar kundu fáa loyvi til at handla við ávísum vørum ávísar tíðir á árinum, tí tað fór bara at merkja, at Einahandlin sat eftir við teimum vørunum, sum lítil vinningur var í, og so var undirskot víst. Tí kom nevndin aftur til tey bæði punktini, sum áður høvdu verið frammi sum mátar at fyrireika ein fríhandil. Tey vóru úthandlar og menning av fiskivinnu.

Úthandlar vóru meira áhugaverdir nú enn í 1824, tí „Handelens Forfatning, Indbyggernes Velstand og Færøernes tiltagende Production" gjørdu, at tað bar til at brúka pening upp á úthandlar. Umframt úthandil í Suðuroy mælti nevndin til at stovna úthandlar í tveimum øðrum støðum. Eftir nærri kanning vóru støðini Trongisvágur í Suðuroy, Vágur í Norðoyggjum og Vestmanna í Norðstreymoy ella Sandavágur í Vágum hildin at vera best egnað. Rentukamarið helt, at úthandilin í Suðuroy kundi byggjast longu sama ár, og tá ið hann var liðugur, kundi farast undir handilin Norðuri í Vági. Í skrivinum hjá Rentukamarinum vóru greiðar ásetingar um, hvørjir bygningar skuldu vera á hvørjum staði, og hvussu teir skuldu síggja út, og Rentukamarið hevði eisini eina greiða meining um, at ein



*Úthandil kom eisini í Vestmanna í 1839. (Mynd: Tjóðsavnið 5101F031)*

handilsforvaltari skuldi vera í hvørjum úthandli. Eitt skip skuldi keypast til at flyta vøru millum úthandlarnar og handilin í Havn, men tað skuldi ikki gerast beinanvegin, tí í fyrstu syftu megnaði sluppin „Thorshavn" helst at taka sær av flutninginum.

Handilsnevndin tók undir við uppskoti Tillischs um, at handilin skuldi kunna selja vøru til fremmand skip, sum løgdu inn í Føroyum, um nóg mikið av vøruni var á goymslu. Í slíkum førum skuldi tað gerast gjøgnum amtmannin, og prísurin átti at verið eitt sindur hægri enn takstprísurin.

Nevndin var meira ivasom viðvíkjandi uppskotinum um at menna eina fiskivinnu við deksførum, tí tað var torført at fáa vinning av útflutninginum av saltfiski, og enn var ikki greitt, um trupulleikar vóru av at framleiða klippfisk, „der ikke hidtil er afbenyttet paa Færøe." Men sjálvt um nevndin var ivasom, so høvdu onnur úttalað seg um „Gavnligheden af Fiskeriet med Dæksfartøier", og tí vóru handilsstjórnin og amtmaðurin samd um, at tað var „saare ønskeligt, at afgjørende Forsøg bleve anstillede". Tíverri var stuðulsskipanin frá 1821 uttan týdning, og tí ivaðust teir í, um tað loysti seg at royna tað aftur, men nú var ein deksbátur um at vera liðugt smíðaður í Havn, og tá ið ynski var um at fáa lán til hesa bygging, skeyt nevndin upp at lata 500 ríkisdálar í láni við trygd í skipinum. Lánið skuldi gjaldast aftur upp á 10 ár, men var annars rentufrítt. Eydnaðist henda ætlan, fóru helst fleiri at gera tað sama, og um so var, skuldu somu lánimøguleikar galda fyri tær ætlanirnar.

Síðsta uppskotið hjá nevndini var at hækka lønirnar hjá fólkunum í handlinum, soleiðis sum amtmaðurin eisini hevði skotið upp 8. januar 1834.

Rentukamarið var samt við nevndini í tí mesta og segði, at uppskotið var „aldeles passende“. Tí viðmælti tað, at 1. Føroyski handilin framhaldandi verður kongligur, 2. At úthandlar verða stovnaðir, 3. At fremmand skip sleppa at keypa cargasonvørur og returvørur í Havn, 4. At skipið, sum verður smíðað í Havn, fær 500 ríkisdálar í láni, og at aðrir íbúgvar fáa somu treytir, 5. At starvsfólkið í handlinum fær betri løn og 6. At handilin kundi brúka av yvirskotinum at gjalda fyri útreiðslurnar av hesum uppskotum, um tað ikki bar til at gjalda fyri alt gjøgnum raksturin. Hetta varð alt kunngjørt í resolutión 20. apríl 1836[95].

## *7.5 Einahandilin á stættatingi*

Í Føroyum vóru fólk helst sum heild væl nøgd við nýggju lógina, men niðri í Danmark hendu stórar broytingar hesi árini, og liberala rákið fekk alsamt størri og størri undirtøku. Eitt avgerandi skifti hendi, tá ið kongur í 1831 noyddist at ganga við til at kalla saman stættating fyri hertúgadømini Slesvík og Holstein. Tað endaði við, at fýra stættating vórðu vald í 1834, og Føroyar vóru partur av Stættatinginum í Roskilde. Umboð føroyinga á teimum báðum fyrstu tingunum í 1835-36 og í 1838 var Christian Ludvig Tillisch, ið hevði verið amtmaður í Føroyum fram til 1830 og tá var amtmaður í Åbenrå og Løgumkloster.

Saman við hesum byrjandi fólkaræðinum var rákið eisini við liberalu hugsanunum um búskap og handil, og skjótt fór tann hugburðurin eisini at merkjast viðvíkjandi Einahandlinum í Føroyum. Meðan nevndararbeiðið var, kom bókin *Om Emancipationen af Færøerne og Grønland* hjá Carl Adolf Muhle út. Muhle hevði síðan 1806 arbeitt við føroyskum málum, fyrst í Rentukamarinum og síðani 1810 sum de facto bókhaldari hjá føroyska handlinum í Keypmannahavn (Muhle 1970b: 5).

Í bókini greiddi Muhle frá ymiskum sjónarmiðum, sum høvdu verið frammi viðvíkjandi handlinum í Føroyum, og endurgav nøkur skjøl frá teimum nevndarviðgerðunum, sum fyrr høvdu verið. Móti endanum á bókini skrivaði hann eina áheitan til kong vegna „Hovedstadens Handelsstand“, sum hann hevði roynt at fingið at taka undir við sínum sjónarmiðum. Í brævinum greiddi Muhle kongi frá, hvussu ringur standurin var blivin síðan kríggið í 1807, og endamálið við áheitanin var at fáa kong at lata upp handilin í Føroyum og Grønlandi, tí tað „kunde vorde Middelet til atter at oplive Hovedstaden og hele Landet.“ (Muhle 1970b: 60)

Motivið fyri at mæla til fríhandil í Føroyum var sostatt, at øktur handil fór at gagna handilsvinnuni í Keypmannahavn. Muhle vísti á góðu gongdina í Íslandi og helt, at í Føroyum var eisini fiskur at fáa, men har var einki skip, og tí „ere de

95 SA. Rentukamarið. 1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland). Álit Rentukamarsins um resolutión 20. apríl 1836.



*Stættatingið í Itzhoe skeyt í 1836 upp, at handilin upp á Føroyar og koloniirnar varð gjørdur fríur. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

raske færøeske Klippesønner vel gode Baade-Roere og Styrere, men heelt uvante og derfor hidtil uduelige Søefolk." Og hann helt áfram:

> Vi maatte og her tage meget feil af disse Øeboers Sindelag og Tanker, om de ikke allerede for længst følte dem modnede til en nye vigtig Overgang i deres Heele Liv, ved at forundes Rettigheder, lige med den øvrige Verdens Børn – til efter Naturens Bestemmelse at blive igien et sammenhængende Led af den heele Verdens Kiede, ved at vorde forundte den Handelsfrihed, som allerede den kongelige Handel-Forordning af 13de August 1790 bebudede dem om 5 Aar (Muhle 1970b: 61).

Her er ongin ivi um, at frælsishugsjónirnar í tíðini høvdu rinið væl og virðiliga við hjá Muhle. Hvussu undirtøkan var fyri hesum sjónarmiðum í Danmark er ógreitt, men bókin varð nógv lisin í Føroyum, og við henni fingu hesar hugsjónir eisini fótafesti. Nøkur ár seinni segði J.H. Schrøter, at bókin „voldte en Agitation, hvorved der dannedes et Parti, der ansaae Monopol-Handelen for yderst trykkende, og bebreidede anderledes Tænkende, at de af Dorskhed taalte at staae under Formynderskab." Hetta „ultra-liberale Partie" helt neyvt eyga við øllum avgerðum handilsins, og hvørja ferð handilin hevði okkurt at finnast at viðvíkjandi útflutningsvørunum, „udskrige" tey tað sum eitt nýtt trýst frá handlinum. Sambært Schrøter byrjaði her ein dystur millum ein ultra-liberalan og ein konservativan flokk[96].

96 Berlingske Tidende nr. 199 frá 27. august 1850. „En historisk Beretning om den kongelige Handels Bestyrelse paa Færøerne."

Liberalistisku sjónarmiðini í Danmark komu eisini til sjóndar, tá ið kongur legði uppskot til nýggja tolllóg fram fyri Stættatingið í Slesvík 15. apríl 1836. § 14 í uppskotinum ljóðaði soleiðis:

> „De med hensyn til Handelen med Vore Vestindiske Colonier, Vore Besiddelser i Ostindien og Afrika, ligesom med Grønland, Island og Færøerne gjældende Bestemmelser forblive uforandrede, og tage Vore Hertugdømmers indenfor Toldgrændsen boende Undersaatter med samme Rettigheder som Vort Kongeriges Undersaatter Deel i denne Handel."

Í nevndarviðgerðini viðmerkti nevndin, sum var sett at viðgera tolllógina, um hesa paragraf, at

> „Enhver Indskrænkning af Handelen kan kun være Almeenvellet skadelig, og af denne Grund maae vi foreslaae, at Handelen paa Ostindien og Afrika saavelsom med Grønland og Færøerne gives aldeles fri."

Uppskotið varð einmælt samtykt í tinginum (Stænderforsamling Slesvig 1836: 1492) og er eitt greitt dømi um, at liberalu kreftirnar í Danmark høvdu ein heilt annan hugburð til Einahandilin í Føroyum, enn kongur og hansara menn higartil høvdu havt.

Tá ið kongur svaraði upp á viðmerkingarnar til lógaruppskotið í byrjanini á næsta stættatingi í 1838, segði hann um spurningin um handilin í koloniunum, at Asiatisk Companie fór at missa sítt privilegium í 1843, og í Guinea vóru ongar lógaravmarkingar í handlinum, men áheitanin frá stættatinginum um handilin í Føroyum hevði gjørt „Frigivelsen af Handelen paa Færøerne til Gjenstand for en nye Undersøgelse, med Hensyn til hvis Resultater Vi dog finde Os foranlediget til, for Tiden endnu at udsætte en forandret Regulering af disse Handelsforhold." Avgjørt varð kortini at fara undir fyrireikingar, og ein nevnd varð eisini sett at viðgera spurningin um at frígeva grønlendska handilin (Stænderforsamling Slesvig 1838: 6–7).

### 7.5.1 Føroyingar vilja eiga part av Einahandlinum

Júst hvat tað var fyri kanning, kongur meinti við, er ógreitt, men tað fekk Schrøter og aðrar føroyingar at ressast við. J.H. Schrøter stóð á odda fyri einum samtaki, sum vildi sleppa at keypa 300 partabrøv í kongliga handlinum fyri tilsamans 30.000 ríkisdálar. Endamálið við partabrøvunum var, at eigararnir á henda hátt kundu læra seg um handilsskap og møguliga savna saman ein kapital, soleiðis at teir vóru betur fyrireikaðir, tá ið fríhandilin einaferð kom. Í brævi til vinmann sín Trevelyan greiddi Schrøter frá, at fólk óttaðust fyri, at um bara 3-4 danskir keypmenn komu í staðin fyri Einahandilin, so fóru teirra handilsmenn í Føroyum at hava avmarkað vald og bara at handla eftir boðum frá fráverandi keypmonnum (Nolsøe og Jespersen 2009: 299). Hetta samtakið sendi á heysti 1838 áheitan til C.L. Tillisch um at virka fyri hesum málinum á Stættatingi.

Pløyen amtmaður helt, at tað helst fór at hava hepna ávirkan á handilin og upp á føroyska hugburðin, um nakrir av mest viðurkendu monnunum í landinum vóru settir í eina støðu, har teir fingu størri innlit í handilin. Hansara veruligu ørindi vóru kortini at fáa at vita, um partabrøvini fóru at verða upp á navn ella upp á handhavara, og um ein og hvør kundi fáa partabrøv, um hann búði í Føroyum ella ikki. Virðið á partabrøvunum fór uttan iva at økjast, um tað var skrivað til handhavara, tí tá kundu tey seljast sum reiður peningur, men tá var eisini vandi fyri, at føroyingar mistu fyrimunin av hesum, og partabrøvini endaðu í hondunum á donskum keypmonnum. Skuldi tað hent, kom ein støða, har farast kundi frá einum kongligum einahandli til eitt monopol av handilsmonnum, og tað var ein støða, sum føroyingar óttaðust fyri, og tað við røttum, tí teir høvdu roynt tær tilvildirnar, sum valdaðu við privatum einahandli, sum ikki hevði nakrar fastar reglur at halda seg til, undir síðsta kríggi. Tí mælti Pløyen til, at partabrøvini ljóðaðu upp á íhendihavara, men bara ein, sum búði í Føroyum. Uttan fyri Føroyar skuldu partabrøvini vera púra virðisleys. Við hesi áheitan helt Pløyen seg hava gjørt sína skyldu at hjálpa føroysku almúguni, „som nu er í færd med at forsøge det første Skridt udenfor de Grændser, der i Aarhundreder haver været anvidst dem og deres Forfædre.“[97]

13. desember 1838 legði fyrrverandi amtmaður Føroya C.L. Tillisch á Stættatingi fram fýra umsóknir frá føroyingum um at fáa loyvi til at keypa partabrøv í Einahandlinum. Tær fýra umsóknirnar líktust í innihaldi sera nógv, so Tillisch las bara hana frá fýra av teimum, sum vóru knýttir at nýggja úthandlinum í Klaksvík. Hugsandi er, at hinar umsóknirnar onkursvegna høvdu samband við hinar úthandlarnar og handilin í Havn.

Í umsókníni vístu umsøkjararnir á, at tað vóru orðini hjá kongi á Stættatinginum í Slesvík 12. mai, sum høvdu fingið teir til at taka stig til umsóknina. Teir óttaðust fyri, at ein privatisering av handlunum fór at verða til lítið gagn fyri føroyingar, um teir ikki fingu lut í handlinum og ávirkan á, hvussu hann varð rikin. Tað var bara við at tryggja sær, at handil helt fram á øllum úthandilsstøðunum, at tað kundi tryggjast, at fríhandil bleiv til fyrimuns fyri bæði rík og fátøk í Føroyum. Til at gera tað kravdist:

> At man kan blive Eier af Etabliccementernes Pakhuse og Effecter, og tillige besidde den til Handelens Førelse fornødne Drifts-Capital, og da Ingen har saa betydelig Formue, saa synes det at være vor eneste Udvei: at forene os i Actie-Selskaber, og derved sammenskyde en Capital, der kan sætte de med hvert Etablissement Handlende istand til, at erlægge Kjøbesummer, og anlægge den fornødne Drifts-Capital i Handelen.

Umsøkjararnir vístu á, at møguleikin fyri at keypa seg inn í Kongliga einahandilin var nevndur í § 31 í fyriskipan um handilin frá 2. juli 1781. Í teirri

97 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 103. Bræv dagfest 6. november 1838 til C. L. Tillisch, umboð føroyinga á Stættatingi.

*Tage Algreen-Ussing var ein av virknastu stættatingslimunum, og hann dugdi ikki at síggja, hvussu tað gagnaði avtøkuni av Einahandlinum, at føroyingar gjørdust partaeigarar í handlinum.*
*(Mynd: wikicommons)*



ásetingini stóð, at undirsáttar kundu keypa partabrøv á 100 ríkisdálar og fáa lut í vinninginum í handlinum, og kongur tryggjaði, at vinningurin ongantíð fór niður um 4 % árliga. Umsøkjararnir søgdu, at vinningur, sum fór upp um 4 %, skuldi leggjast til síðis, so at neyðugi peningurin var til taks, tá ið fríhandilin kom. Teir roknaðu ikki við, at nakar vandi var fyri, at kongligu kassarnir fóru at missa inntøku av hesum átakinum, tí sum partaeigarar fóru teir sjálvandi at gera sítt til at tryggja, at góðskan á vøruni var nøktandi, og at meira sum heild fekst burturúr. Sjálvir ivaðust teir ikki í, at hesin hátturin var tryggasti og besti mátin at fyrireika føroyingar til fríhandil. Tillisch tók fult undir við umsóknunum og mælti til, at spurningurin varð koyrdur í eina nevnd. Tað vóru 51 tinglimir samdir við honum í, meðan 2 vóru ímóti. Tí varð ein trímannanevnd vald. Tillisch fekk 51 atkvøður, Haagen bankastjóri fekk 34, og Grosserer Knudtzon fekk 31 atkvøður (Stænderforsamling Slesvig 1838: 947–954).

Nevndin legði 15. desember fram álit í málinum, og hon segði seg vera púra samda við umsøkjararnar um, at hetta var besti mátin at fyrireika føroyingar upp á ein komandi fríhandil, og tí skeyt nevndin upp, at Stættatingið skuldi geva kongi eina áheitan um, at føroyingar sum fyrireiking til komandi fríhandil skuldu sleppa at keypa partabrøv í Kongliga handlinum. Málið kom til viðgerðar 21. desember, og viðgerðin byrjaði við, at Tillisch greiddi frá, at føroyingar ikki høvdu biðið um fríhandil, men bara høvdu biðið um møguleikan at fyrireika seg til komandi fríhandilin, sum kongur hevði umrøtt á Stættatingi í Slesvík.

Umboðsmaður kongs í tinginum helt ikki, at nevndin við sínum áliti hevði gjørt tinglimirnar nógv klókari um málið, og undir øllum umstøðum helt hann, at hetta var eitt mál, sum umsøkjararnir áttu at vent sær til Rentukamarið við. Tage Algreen-Ussing helt eisini, at málið var eitt sindur ógreitt, tí hann skilti ikki, hvussu samanhangur kundi vera ímillum ætlanir kongs at innføra fríhandil, og at føroyingar skuldu fáa partabrøv í Einahandlinum. At brúka hesi partabrøvini sum fyrireiking til fríhandil riggaði bara, um tað tók sína tíð at gjøgnumføra fríhandilin, og tí kundi úrslitið av hesum uppskotinum gerast, at „det netop kunde forhindre Handelens Frigjørelse". Hann helt, at veruliga endamálið var bara at fáa lut í handilsins fyrimunum og ognum, tá ið hann varð avtikin. Somu hugsan høvdu Captain Herforth, Frederik Treschow, Peter Salicath og kongsins umboðsmaður.

Tillisch royndi at greiða frá, hvussu handilin virkaði og hevði virkað í øldir, fyri at fáa tinglimir til at skilja, at hetta var ein roynd hjá fólkinum at „forberedes paa den vigtige Crisis, som forestaaer det, og jeg skjønner ikke, at dette kan skee paa en simplere og bedre Maade." Hann lovaði eisini, at talan var ikki um „Vindesyge" hjá nøkrum einstaklingum, men um livandi áhuga fyri landsins framtíð. Hetta fekk kortini ikki yvirbevíst mótstøðumenninar, so tað endaði við, at Tage Algreen-Ussing skeyt upp at samtykkja, at eingin áheitan varð gjørd í hesum málinum. Salicath legði afturat, at henda áheitanin var ikki eitt lógaruppskot, men heldur ein umbøn um at fáa „et Gode eller en Faveur", og tað kundi tað bara vera kongur sjálvur, sum tók støðu til.

Tá ið málið kom til endaliga viðgerð 22. desember, varð uppskotið hjá Algreen-Ussing samtykt við 33 atkvøðum fyri og 25 ímóti. Sostatt hendi ikki meira við hesi ætlanini um, at føroyingar skuldu fáa lut í Einahandlinum, so teir á tann hátt kundu venjast til fríhandil. Henda viðgerðin á Slesvík og Roskilde stættatingum hevði víst, at fyri liberalu umboðsmenninar í byrjandi fólkaræðinum var Einahandilin ein fornleivd, sum skuldi avtakast skjótast gjørligt. Teir vóru í hesum spurninginum farnir uppaftur longri tann liberala vegin, enn kongur og hansara stjórnarráð vóru komin, so um somu tíð, sum amtmaðurin í Føroyum fór at hugsa líka framskygt sum kongur, fingu enn frælsari hugsanir rúmd, sum gjørdu, at hugurin spakuliga at broyta handilin kom at tykjast meira afturhaldandi, enn hann upprunaliga var. Frá spírandi fólkaræðinum var lítil undirtøka fyri, at fríhandilin kravdi eina fyrireikingartíð.

## *7.6 Samandráttur*

Eitt avgerandi skifti í hugburði var hent, tá ið F.F. Tillisch amtmaður fekk spurningin, hvat gerast skuldi við útlendsku fiskiskipini kring Føroyar, tí hann mælti til at taka kappingina ímóti hesum skipum upp heldur enn at seta forðingar í vegin fyri teimum, sum undanmenn hansara høvdu gjørt. Tað sama hendi í

spurninginum um loynihandil, tí eisini har mælti hann til at menna Einahandilin, so at loynihandil gjørdist óneyðugur, heldur enn at laga verjugarðin kring Føroyar enn hægri upp. Við øðrum orðum fór hann burtur frá einum politikki, har tað ráddi um at verja støðuga føroyska samfelagið móti nýggjari ávirkan uttaneftir, til ein politikk, har endamálið var at menna landið, so tað kundi samanbera seg við grannalondini.

Tillisch ásannaði, at neyðugt var at menna eina fiskivinnu, men hann var ikki við upp á, at tað almenna blandaði seg nakað serligt upp í eina slíka menning. Tí legði hann dent á, at menningin av nýggjum vinnum skuldi koma frá føroyingum sjálvum. Hann tók tí stig til at savna fólk í einum felag, „Landhuusholdningsselskabet for Færø Amt", har borgarligu hugsjónirnar kundu gerast til veruleika. Saman við øðrum tók hann persónliga stig til at smíða eitt fiskifar, sum kundi virka sum fyrimynd, men felagið fekk eina stutta livitíð, og skonnartin kom ongantíð rættiliga í gongd við fiskivinnu, og saman vístu hesar miseydnaðu ætlanirnar, at leiðin hjá Tillisch at menna fólkið, sum síðani kundi menna nýggjar vinnumøguleikar, var ikki ein gongd leið.

Hinvegin var tað helst henda lítla skonnartin, sum gjørdi, at fiskivinna gjørdist partur av fyriskipanini um ábøtur á handilin, sum varð kunngjørd 20. apríl 1836, tí bæði Handilsstjórnin og Tillisch sjálvur vóru undir samráðingunum ikki serliga sannførd um, at stórir møguleikar vóru tann vegin. Tað vóru tveir aðrir embætismenn hinvegin, tí bæði Pløyen fúti og Hunderup sorinskrivari tóku fult undir við at stuðla einari fiskivinnu, tí tað var besti og møguliga einasti mátin at lyfta landið upp á eitt stig, har til bar at avtaka Einahandilin. Hesir báðir fingu stóra ávirkan komandi árini, tá ið Pløyen tók við sum amtmaður, eftir at Tillisch fekk annað amtmansembæti, og Hunderup helt áfram sum sorinskrivari.

Sostatt var nógv broytt í hugburði til Einahandil og búskaparliga menning hesi árini, men á øðrum mótum gekk enn skjótari við liberalistisku ávirkanini. Danska ríkið fekk í 1834 fýra stættating, og tá ið Einahandilin var fyri har, var eingin ivi um, at fólksins umboð hugsaðu um hesa skipanina sum eina avoldaða fornleivd, sum langt síðani átti at verið avtikin. Frá komandi fólkaræðinum kundi Einahandilin ikki vænta sær nakran stuðul.

# *8. kapittul*
# *Pløyen leggur lunnar undir fiskivinnu*

Á sumri 1837 varð F.F. Tillisch útnevndur til amtmann í Ringkøbing amti, og tá ið sluppin „Havfruen" tíðliga í juni skuldi aftur til Danmarkar, avgjørdi hann at fara við henni. Hann setti tí 7. juni Christian Pløyen, fúta, sum fyribils settan amtmann og kommandant fyri Føroyar. Samstundis læt hann honum amtsins skjalasavn og teir lutir, sum hoyrdu til verjutænastuna. Hann læt eisini Pløyen amtmanshúsini og sendi Rentukamarinum eina váttan frá Pløyen um, at hann hevði tikið við øllum hesum[98]. Tá hevði kongur longu 8. mai avgjørt at seta Pløyen sum nýggjan amtmann og kommandant í Føroyum, og Rentukamarið skrivaði bræv til Pløyen við boðum um tað 15. juni. Boðini komu fram til Føroya 26. juni, so frá tá av var Pløyen amtmaður í Føroyum[99].

Pløyen hevði longu sum fúti víst stóran áhuga fyri at menna fiskivinnu í Føroyum. Í sínum áliti til nevndina, sum viðgjørdi handilsspurningin veturin 1835-36, vísti hann greitt, at hann hevði eina øðrvísi fatan av, hvønn leiklut tað almenna skuldi hava í menningini av fiskivinnuni, enn táverandi amtmaðurin hevði. Meðan Tillisch mælti til at menna eina fiskivinnu, men við so lítlari almennari uppíblanding sum gjørligt, helt Pløyen, at alt skuldi gerast fyri, at „Handelsdirektionen maatte begunstige den begyndende Søefart...med enhver billig Lettelse." Pløyen helt, at menning av fiskivinnu var av allar størsta týdningi fyri framtíðina í Føroyum, og hann helt, at fyriskipanin frá 20. apríl 1836 greitt vísti, at búskaparlig atlit vórðu løgd til síðis, tá landsins menning merkti, at tørvur var á at ofra nakað.

## *8.1 Spyr embætismenn um fiskivinnumenning*

Tí var eitt uppskot til Rentukamarið um, hvussu fiskivinna kundi mennast, nakað av tí fyrsta, hann sum nýsettur amtmaður setti sær fyri at gera. 30. oktober 1837 sendi hann fútanum, sorinskrivaranum, handilsforvaltaranum og Schrøter, fyrrverandi presti, boð um at greiða sær frá, hvat teir hildu um henda spurning. Í brævinum til fútan skrivaði hann:

98 TSS. Færø Amt. Kopibók O, bræv nr. 170. Bræv til Rentukamarið frá Tillisch amtmanni dagfest 7. juni 1837.

99 TSS. Færø Amt. Kopibók O, bræv nr. 177. Bræv til Rentukamarið frá Pløyen amtmanni dagfest 3. juli 1837.

> At Fiskeriet omkring Færøerne deels bliver forsømt, deels drevet paa en yderst utilfredsstillende Maade, er, desværre!, en anerkjendt Sandhed, der bestandigt har frembragt og næret Ønsket om, at denne vigtige Indtægtskilde maatte blive afbenyttet paa en hensigtsmæssigere Maade, og Fiskeriet drevet med Dæksfartøier.
>
> Det er min Hensigt, at indgaae med et Forslag i denne Anledning til det kongelige Rentekammer, og jeg skulde derfor tjenstligst anmode Hr. Landfogden om, at ville meddele mig Deres behagelige Betænkning angaaende, enten de anseer det rigtigst, at et forbedret Fiskerie anlægges for kongelig Regning, eller at det tillades Private, som dertil maatte have Lyst, her at etablere sig for at fiske med Dæksfartøier, hvilke Begunstigelser da, i sidste Fald, troer at kunne og burde tilstaaes de Private, om en saadan Institution vil kunne bestaae ved Siden af Monopolet, uden at skade samme, samt hvor stor en Driftscapital, de anseer nødvendig, til at begynde et saadant Foretagende[100].

### 8.1.1 Fútin viðmælir

Lunddahl fúti var nýliga settur, so hann hevði helst viljað bíðað eitt sindur við at svara upp á ein so stóran spurning, men av tí, at hann møguliga ikki fór at verða spurdur aftur, avgjørdi hann at svara kortini. „Jeg speculerede derfor, fra November Maaneds Begyndelse til Februar Maaneds Udgang, uafladeligen paa at drive Fiskerie en gros; hvorefter jeg tilstillede Amtmanden hvad jeg havde seet mig i stand til at udarbeide.“[101] Fútin svaraði 28. februar 1838, og hann ivaðist ikki í, at fiskivinna fór at kunna fáa stóran týdning fyri Føroyar. Hann innleiddi sínar viðmerkingar soleiðis:

> At Havet er rigt paa Fisk i Nærheden af Færøerne er, saa vidt mig bekjendt, en uomtvistet Sandhed. Under denne Forudsætning maa der, naar Fiskeriet drives herfra i det Store, kunne erholdes rigelig Fangst, som, behøringen tilvirket, vel vilde kunne fordelagtigen anbringes i Handel. Omfattende Foretagender, ved hvilke selve Fiskningen blev drevet med Iver, Fangsten tilvirket med Omhyggelighed og forhandlet med speculerende Interesse, maatte saaledes sikkerligen kunne lønne sig.

Fútin býtti sína viðgerð í tríggjar partar, tí hann sá fyri sær tríggjar møguleikar fyri, hvussu fiskivinnan kundi skipast. Tað kundi antin gerast fyri kongliga rokning, við at lata Einahandilin so frætt upp, at fiskivinnan var leys av honum, ella við at geva einstøkum privatum feløgum serlig loyvi.

Fyrimunurin við, at kongur sjálvur rak fiskivinnuna, var, at vinningurin endaði í kongliga kassanum, men hesin mátin var ikki so gagnligur fyri føroyingar, tí long tíð fór at ganga at venja føroyingar við hesa nýggju vinnuna. Ein annar fyrimunur var, at ein fiskivinna fór at gera tað møguligt at professionalisera handverksvinnuna,

100 TSS. Fútasavnið. Indkomne breve 1836-40. Bræv til fútan dagfest 30. oktober 1837.

101 SA. Rentekammeret. Diverse breve og dokumenter vedr. Færøerne og den færøske handel (1682-1847). Bræv frá Lunddahl fúta til etatsraad Collin dagfest 15. juli 1838.



*Jacob Andreas Lunddahl var júst byrjaður í starvinum sum fúti í Føroyum, tá ið Pløyen bað hann geva sær sínar hugsanir um eina framtíðar fiskivinnu í Føroyum.*
*(Mynd: Havnar søga, bind 5)*

so tað gjørdist møguligt hjá handverkarum at liva av handverki sínum, og tað var eitt stórt framstig, tí sum var, var handverksvinnan sera blandað, tí „næsten enhver har mange færdigheder". Tað fór at geva betri smiðir, timburmenn, bøkjarar, reibsláarar o.s.fr., umframt at fleiri fóru at læra „Søvæsen, Fiskeri og Tilvirkning". At enda fór ein fiskivinna eisini at verða til fyrimuns fyri tey fátøku, tí møguleikarnir fyri at fáa eina dagsløn sum dagleigari fóru at økjast.

Fútin helt kortini ikki, at hesin møguleikin fór at verða ein „udvikling af Øernes oeconomiske Kraft", tí handilsfrælsi kravdist, um føroyingar sjálvir skuldu reka fiskivinnu. Tað var Einahandilin, sum var orsøkin til, at føroyingar ikki longu fiskaðu meira.

> Ved denne Institution er vel, paa den ene Side, menneskekjærligen sørget for Landets Forsyning, med Fornødenheder, som det har savnet oeconomisk Udvikling til selv at forskaffe sig ved activ Handel. Men paa den anden Side, er ved de dermed forbundne Indskrænkninger et Baand lagt paa den Speculationsaand, som er en naturlig Spire til enhver større Entreprise.

Tey gjøldini, sum handilin legði á bæði innflutningsvøru og útflutningsvøru, gjørdu, at tað illa loysti seg at fáast við fiskivinnu, og tí var heldur eingin menning hend. Hann skeyt tí upp, at føroyingar fingu loyvi til frítt at flyta inn tilfar til skipabygging og útgerð og annað til skipsrakstur, og tað skuldi eisini vera frítt at flyta fiskavørur úr Føroyum bæði til Danmarkar og onnur lond. Tá ið eitt reiðarí flutti inn vørur til sín rakstur, skuldi tað eisini hava loyvi til at selja somu vørur í Føroyum, og á tann hátt kundu timbur, aðrar trævørur, jarn, húkar, hampur,

tjøra og salt seljast frítt, men handilin skuldi halda fram at selja hesar vørur og at taka ímóti fiski, „til activ Handel fra Færøerne ere kommen i Gang.“ Á henda hátt kundi ein handil menna seg undir liðini á Kongliga einahandlinum, og burtur úr tí fór at koma:

> Et udvidet Fiskerie vilde blive en Følge af de ovennævnte friere Handelsforhold, og at Færøerne da, ved en forøget Production, snart vilde blive behørigen forberedede til at kunne modtage en fuldstændig Frihandel, som derimod med Grund kunde frygtes saalænge som Landet endnu er passivt af Mangel paa tilstrækkeligen benyttede Hjælpekilder. Om end Ingen af dets nuværende Beboere, blandt hvilke dog findes flere Velhavende, som kunde forene sig, gjorde Begyndelsen med at anskaffe Materialier til Fartøier og Fiskeriets Drivt i det Store, vilde vistnok, inden kort Tid, Andre finde Anledning til at nedsætte sig her og føre sig Leiligheden til Nytte. Og hvor ingen Enkelt havde privilegium exclusivum, vilde Adgang til at følge Exemplet altid staae enhver Indbygger aaben. Dette livlige og i sin indskrænkede Sphære opvakte Folk vilde snart blive Duelige Søemænd, Fiskere, Haandværkere og Handlende og i det hele snart, ved den Trang til stigende Oplysning, som følger med udvidet Virksomhed, fremskyndes til at kunne finde sig til rette i den civiliserede Verden, som nu i mange Henseender er en lukket Bog for Færøernes Beboere.

Fútin hugsaði sostatt beint øvugt av tí, sum Tillisch hevði roynt, tí broyting var neyðug fyri at lyfta føroyingar inn í siviliseraða heimin. Við øðrum orðum kom vinnuliga broytingin fyrst, og síðani hugburðsbroytingin millum fólk.

Skuldi ein privatur entreprenørur hava serloyvi til at fiska undir Føroyum, kravdist, at hann hevði frítt at innflyta útgerð og at selja fisk og lýsi, men hann skuldi ikki hava loyvi til at handla við føroyingar, tí tað fór at hava skaðiliga ávirkan á Einahandilin. Eitt serloyvi gjørdi, at tað helst bar til at fáa entreprenørin at hjálpa til við at byggja „offentlige Anlæg og Foranstaltninger“. Einasti vansin fyri Einahandilin var, um serloyvið varð misbrúkt. Tí mælti fútin til, at virksemið varð savnað í einum stað, og sjálvur helt hann, at „kunde Thorshavn dertil blive valgt, vilde meget være vundet for denne næringsløse Bye, der nu engang har faaet Existens og derved et Krav paa Forsørgelse.“ Ein annar fyrimunur við, at eitt slíkt privat átak lá í Havn, var, at her kundu handilsforvaltarin og fútin sjálvur hava eftirlit við virkseminum á sama hátt, sum teir høvdu havt, tá ið Ryberg hevði handil í Havn. Skuldi virksemið vera í øðrum stað, var neyðugt hjá tí almenna at seta eftirlitsfólk í starv. Enn var trongdin hjá embætismonnum á at halda eyga við fiskivinnuni ikki horvin.

Í niðurstøðu síni segði fútin, at hann helt, at Einahandilin var „en uoverstigelig Hindring for Fiskeriets Drivt i det store ved Færøernes Beboere.“ Størsti fyrimunurin fyri landið var tí, at Einahandilin varð linkaður so frægt, at til bar at reka fiskivinnu frælst undir liðini á honum. Tað bar eisini til at reka fiskivinnu fyri annaðhvørt kongliga rokning ella av privatum entreprenørum, men tá vildu



*Lunddahl fúti mælti til, at fiskivinnan varð savnað í Havn, tí býnum vantaði inntøkur, og har var lætt hjá embætismonnum at hava eftirlit við vinnuni. (Mynd: Tjóðsavnið 4827F01836K)*

„Færingerne vel ikke see en Velstandskilde gjort frugtbringende directe for Landet i det hele", men óbeinleiðis fingust fyrimunur av einari professionaliseraðari handverksvinnu og øktum kunnleika til sjómansskap o.a. Skuldi hann velja millum kongligan ella privatan rakstur, var tann privati frægari, tí kongligur rakstur var so bundin at reglum og formum, og ideologiskt sæð áttu „Erhverv i Almindelighed vel med størst Fordeel for Statssamfundet at drives af Private."

Lunddahl fúti dugdi ikki at siga, hvussu nógvur kapitalur skuldi til fyri at byggja upp eina rættiliga fiskivinnu í Føroyum, men hann sá fyri sær, at tá ið hon einaferð var komin ordiliga í gongd, fór at verða brúk fyri pakkhúsum og íbúðum, handverkarahølum, timburplássum, plássi til at umvæla skip og annað, umframt alt tað, sum skuldi gerast til fiskavirkingina fleiri staðni í landinum. Harumframt komu 2 ella 3 stór farmaskip og nógv smærri deksfør. Fútin hevði viljað, at hann hevði fleiri royndir, og tí kundi viðmerkt meira um hetta, sum „efter den Indsigt, jeg hidtil har kunnet erhverve mig i Færøernes oeconomiske Forhold, er af indgribende Interesse for denne Deel af Hans Majestets Lande."[102]

### 8.1.2 Sorinskrivarin svarar

Hunderup sorinskrivari svaraði 3. mars 1838, og í svari sínum vísti hann til svarið, sum hann hevði givið Tillisch upp á líknandi spurningar í 1835. Hann var

102 TSS. Fútasavnið. Kopibók 1/1 1838 til 13/8 1841. Bræv nr. 5. Bræv frá Lunddahl fúta til Pløyen amtmann dagfest 28. februar 1838.

framvegis av somu áskoðan sum tá, so hann fór mest at leggja afturat við hesum nýggja skrivinum. Hunderup var, eins og so nógvir undan honum, vísur í, at landbúnaðurin var ein nógv støðugari vinna, enn fiskivinnan var, men av tí, at tað var so avmarkað, hvat landbúnaðurin kundi kasta av sær, „saa er det klart, at Fiskeriet for dette Lands Beboere maae blive en af deres vigtigste Næringsveie.“ Eitt prógv um tað var, at fleiri vóru væl fyri í Norðoyggjum enn aðrastaðni, sjálvt um har var torført at velta jørðina, og landbúnaðurin tí næstan ikki var til har. Orsøkin var, at Norðoyggjar lógu best fyri til fiskarí, og tað prógvaði fyri Hunderup, hvussu stóran týdning fiskivinna hevði í mun til landbúnaðin.

Stóri trupulleikin við fiskarínum var sambært Hunderup, at bara smáir róðrarbátar vóru nýttir. Tað gjørdi, at bara Norðoyggjar og norðastu bygdirnar í Eysturoy og Streymoy sluppu út á góðu miðini á Norðhavinum, meðan fólk í Sandoy, Vágum og Suðuroy ongan møguleika høvdu at fiska. Loysnin var at fáa deksfør. Við teimum fekst „Udvidelse i en dobbelt Retning, dels dermed at Beboerne overalt paa Landet paa denne Maade fik Adgang til at drive Fiskeriet som Næringsvei, dels derved at en større Deel af Fiskebankerne kunde besøges, som nu maae blive uafbenyttede.“ Við deksførum var eisini nógv at vinna í bæði tíð og orku, tí við bátunum skuldi manningin rógva heim hvørt kvøld. Tí fóru í minsta lagi 6 tímar um dagin í miðal til at rógva út og heim, meðan tað hjá deksførum bar til at liggja á miðunum, til báturin var fullur. Var arbeiðsdagurin 12 tímar, bar til at fiska í dupult so langa tíð umborð á deksfarinum sum umborð á róðrarbátinum. Hann hevði roknað seg fram til, at 7 mans á einum deksfari kundu fiska tað sama sum 28 mans á báti. Orsøkin var, umframt tíðarspilluna, at til bar at hava betri reiðskap umborð á deksførunum.

Hunderup helt, at royndir høvdu víst, at „Indgriben fra det Offentliges Side i Næringsveiene, som oftest forfeile Øiemedet og virke mere til Skade end til Gavn“, og tí var einki endamál í at fara undir fiskivinnu fyri kongliga rokning, sjálvt um endamálið var at vísa føroyingum møguleikarnar í vinnuni.

So var spurningurin, um tað skuldi latast upp til danskar keypmenn at reka fiskivinnuna, men tað helt sorinskrivarin uppaftur minni um, tí tað „kun vilde være til Landets Ruin.“ Hann fór so langt sum at siga:

> At man, ved at monopolisere Fiskerierne til Fordel for enkelte Private, vilde gjøre sig skyldig i den største Uretfærdighed mod Landets Beboere, er vel i sig selv saa indlysende, at det ikke behøves noget yderligere Beviis... jeg indseer ikke hvorfor en Samling af danske Kjøbmænd udelukkende skulde overdrages et Hverv, hvortil Færingen er født og baaren, og hvortil han altsaa har en langt naturligere Ret.

Ímóti hesum sjónarmiði hansara kundi kanska sigast, at allar almennar royndir at eggja føroyingum til at fara undir fiskivinnu higartil høvdu verið nyttuleysar, tí føroyingum vantaði kunnleika og kapital. Hunderup ivaðist ikki í, at vónin um vinning fór at verða besta eggjanin hjá føroyingum, og hann helt heldur ikki,



*Hunderup sorinskrivari helt ikki, at kapitalur vantaði í Føroyum, tí bert seks ár eftir, at Sparikassin varð stovnaður, stóðu 11.000 ríkisdálar í honum, og tað var bara ein evarska lítil partur av tí kapitali, sum fólk høvdu liggjandi heima. Cathrine Maria Johannesdatter átti fyrstu konto í Færø Amts Sparekasse.(Mynd: Eikirøtur)*

at tað var so víst, at kapitalur vantaði, tí nýggi Sparikassin hevði longu 11.000 ríkisdálar innistandandi, „og det er notorisk at denne Sum kun er en saare liden Deel af hvad der henligger hos Beboerne frugtesløst." Hann helt, at orsøkin til, at einki var komið burtur úr royndunum at eggja til fiskivinnuroyndir, var, at tað higartil hevði verið útgangsstøðan, at Einahandilin og nýggju royndirnar einki høvdu við hvørt annað at gera. Hinvegin hevði Einahandilin alla tíðina tikið nýggjar føroyskar vørur upp í sín takstlista og soleiðis forðað fyri, at tað bar til at selja tær frítt.

Við øðrum orðum helt eisini sorinskrivarin, at Einahandilin var forðingin fyri eini menning av fiskivinnuni, og hansara liberalistiski hugburður kom greitt til sjóndar, tá ið hann skrivaði, at

> Frihed er til en vis Grad en nødvendig Betingelse for den hele menneskelige Virksomhed; dette gjælder ei blot om Menneskets Virken i Aandens Retninger, men ogsaa hvor Talen kun er om den Deel af dets Virken, der gaaer ud paa Udviklingen af de materielle Kræfter. I Jordens og Havets Skjød er paa en Maade al menneskelig Rigdom indsluttet, og det er kun under en Kamp at Mennesket aftvinger Naturen sit Bytte; men skal han med Held kunne bestaae i Kampen, maae man give ham frie Hænder. At antage, at Næringsveie, i Særdeleshed de productive, skulle kunne hæve sig og uddannes under et Monopol er derfor i sig selv en Modsigelse, thi Monopolet maae ifølge sin Natur, binde og lamme

den menneskelige Virksomhed og bliver som en følge heraf den industrielle Virksomheds Grav.

Tað, sum Einahandilin hevði gjørt, gekk beint ímóti hesum frælsinum, og sjálvt um Einahandilin síðani 1790 skuldi vera ein fyribils skipan, meðan fyrireikingar vóru gjørdar til, at føroyingar kundu taka ímóti fríhandlinum, so hevði hann gjørt tað mótsætta. Fyrireikingarnar til fríhandilin skuldu gerast við at lata „Monopolets Baand i enkelte Erhvervsflidens Hovedretninger" upp, so at „Beboerne, under Frihedens Udøvelse i disse enkelte Retninger kunde blive skikkede og samle Kraft til i Tiden at nyde Friheden i sin Fulde Udstrækning", men Handilsstýrið var farið beint mótsættan veg, og hevði „udvidet og givet Monopolets Baand den størst mulige Udstrækning." Úrslitið var, at vinnulívið var á einum lægri stigi nú, enn tað var í 1790. Sostatt vóru føroyingar ikki orsøkin til, at royndirnar hjá stjórnini at menna vinnuna í Føroyum, vóru miseydnaðar, men heldur mátin, sum Einahandilin hevði verið stýrdur uppá.

Hansara uppskot var tí tað sama, sum fútin var komin við, nevniliga at gera tað frítt at innflyta og útflyta alla vøru, sum hevði við fiskivinnuna at gera. Hann helt kortini eisini, at hesi frælsi skuldu galda fyri danskar keypmenn, tí so var møguleiki fyri, at fleiri av teimum fóru at seta seg niður í Føroyum at handla við teimum vørum, sum hoyrdu fiskivinnuni til, og tað fór at vera ein lætti hjá teimum føroyingum, sum ikki sjálvir hættaðu sær undir uttanlands handil. Sorinskrivarin var vísur í, at um hesi frælsi ikki vóru latin, so fór fiskivinnan ikki at mennast, og mentist fiskivinnan ikki til eina sjálvstøðuga vinnu, „vil Landet rimeligvis aldrig nogensinde opnaae det Tidspunkt, at en almindelig Frihandel kan blive gavnlig og heldbringende for samme."[103]

Tá ið Pløyen fekk hesi bæði svarini, kundi hann ikki vera í iva um, at hansara næstu starvsfelagar vóru samdir um, at tað vóru føroyingar, sum skuldu menna fiskivinnuna, og at tað var Einahandilin, sum var stóra forðingin fyri, at hetta stig, sum var so avgerandi fyri framtíðar menning av landinum, varð tikið. Lunddahl og Hunderup vóru samdir um, at fiskivinna var framtíðin, og at Einahandilin var fortíðin. Eftir var bara at finna út av, hvussu hetta skiftið kundi gerast í verki.

Í fyrstu syftu bíðaði Pløyen eftir svari frá hinum báðum, sum hann hevði spurt, men einki svar kom. Schrøter, sum varð spurdur, tí hann var so kønur í lokalum viðurskiftum og hevði fingist við at reiða skip út, helt seg ikki til at svara. Heldur ikki handilsforvaltarin svaraði, og tað skuffaði Pløyen. Hann hevði fleiri ferðir mint hann á tað, og Nolsøe hevði lovað at svara, men einki svar kom. Serliga tað, at hann ongantíð helt lyfti síni, var skuffandi, tí „han burde ikke, ved Løfte, have henholdt en Sag, som jeg anseer for saare vigtig, og om hvilken det i lang Tid har været mit indelige Ønske, at fremsætte min ærbødigste Mening." Vantandi

103 TSS. Savn sorinskrivarans. Kopibók 1833-1839, bræv nr. 406. Bræv frá Hunderup sorinskrivara til Pløyen amtmann dagfest 3. mars 1838.

svarið frá forvaltaranum var einasta orsøk til, at Pløyen sjálvur ikki gjørdi meira við málið fyrr enn nærum eitt ár seinni.[104]

Ein orsøk til, at Pløyen fyrst bíðaði eftir svari frá handilsforvaltaranum og seinni ilskaðist um, at einki svar kom, var helst, at hann sum amtmaður hevði ávísar eftirlitsskyldur viðvíkjandi Einahandlinum og vøruinnflutninginum til Føroya. Pløyen sá heldur ikki Kongliga einahandilin sum ein líka stóran trupulleika, sum fútin og sorinskrivarin gjørdu, og hann var heldur ikki so heitur fyri at avtaka Einahandilin, tá ið hann svaraði Tillisch upp á spurningar um tað 29. september 1835. Trupla samskifti við handilsforvaltaran var ein av fleiri orsøkum til, at Pløyen í 1838 broytti hugsan um Einahandilin, og tá ið henda broytta hugsan var grundarlag undir tí, sum Pløyen amtmaður seinni gjørdi fyri at menna fiskivinnuna, er vert at kanna orsøkirnar til broytingina nærri. Samstundis gevur ein slík lýsing eisini eitt gott innlit í, hví Einahandilin var ein forðing fyri menningini.

## *8.2 Amtmaður broytir hugsan um Einahandilin*

Í svarinum til Tillisch greiddi Pløyen frá, at tá ið hann kom til Føroya í 1830, helt hann, at Einahandilin var „en unaturlig og trykkende Institution", men tá ið hann lærdi føroyska samfelagið nærri at kenna, „forandres denne Anskuelse af sig selv, naar man bemærker, hvilken almindelig Velstand og Tilfredshed med de udviste Kaar, der er udbredt paa dette fattige Land". Um fríhandil kom uttan at vera sera væl fyrireikaður, fór tað at geva onkrum einstaklingi fyrimunir, men „den vilde ogsaa aldeles tilintetgjøre de fattige." Beinleiðis orsøkin var, at fátøk arbeiddu fyri triðing, soleiðis at skilja, at tey fingu ull at virka frá bóndum, og teirra løn var ein triðingur av tí, sum framleiddu klæðini kundu seljast fyri. Hetta bar bara til, so leingi sum prísurin á ull var so lágur, at tað ikki loysti seg at selja hana óvirkaða. Við fríum handli fóru hesi viðurskiftini skjótt at broytast, og tá fóru tey fátøku at mangla eina týdningarmikla inntøku.

Pløyen ásannaði kortini, at Einahandilin eisini var skaðiligur, tí hann hevði gjørt, at føroyingar í handli og vandli vóru „at betragte aldeles som Børn". Teir vóru vanir við at kunna býta um vørur í handlinum til fastan takst. Tí vóru teir eisini púra óvandir við vanligan handil, og tað gjørdi, at „de have en barnagtig Begjærlighed efter fremmede Bagateller, og kiøbe den gjerne 3 à 4 Gange over dens Værdi." Undir slíkum umstøðum fór tað at blíva ein vanlukka at lata føroyingar upp í hendurnar á privatum spekulantum. Tí var ein bæði mentanarlig og ídnaðarlig menning av íbúgvunum ein „aldeles nødvendig Betingelse for en frie Handel."

---

104 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 137. Bræv frá Pløyen amtmanni til Rentukamarið dagfest 26. februar 1839.

*Pløyen amtmaður helt í fyrstuni, at brúk var fyri Einahandlinum í Føroyum, men við tíðini ásannaði hann, at Einahandilin var stóra forðingin fyri menningini av samfelagnum.*
*(Mynd: Tjóðsavnið 8745F100e)*



Pløyen hevði sjálvur prátað við „Landets fornuftigste Mænd“, og hann var vísur í, at sjálvt um onkur einstakur hevði stórar vónir til fríhandil, so hevði tann stóri meirilutin av fólkinum einki hægri ynski enn at varðveita verandi støðu, til føroyingar sjálvir megnaðu at útflyta vørur sínar á egnum skipum. Síðani greiddi hann frá, hvat hann helt skuldi gerast at fyrireika fríhandil. Í undanfarna kapitli er greitt frá, hvørjar møguleikar hann sá í eini komandi fiskivinnu, sum hann helt fór at skapa eina sjófarandi stætt. Ein handilsstætt skuldi eisini skapast, og tað kundi gerast við, at 8 til 10 dreingir vórðu sendir til Keypmannahavnar at læra. At enda skrivaði Pløyen í áliti sínum:

> Det er mueligt, at jeg, med disse mine dristige Forslag, har berørt Forhold, som jeg ikke tilfulde kjender eller er i stand til at bedømme. Det tjene da til min Undskyldning, at jeg har skrevet efter min beste Overbevisning, besjælet af Iver for Færingernes sande Vel, og det tillades mig slutteligen at anføre, at uden grundig Veiledning og Understøttelse, og det en meget betydelig, ville Færingerne blive staaende paa de samme Teier, hvorpaa de nu i lang Tid have staaet. De føle sig tilfredse og lykkelige saaledes som de nu leve, de Goder, som de kjende, kunne de, ved Flid og Anstrængelse opnaae, og derfor tilskynder ingen indre Drift dem til at stræbe fremad, til at gjøre Opoffrelser og vove noget, hvor Vindingen er usikker og Tab muligt: at dette er Folkets Tænkemaade, kan jeg sige med Bestemthed og af Erfaring. –

Hetta sitatið vísir greitt, at tað í hvussu er í eygunum á Pløyen var vónleyst at fáa

nakra broyting framda, sum stavaði frá fólkinum. Skuldi nakað henda, so vóru tað teir ovastu embætismenninir, sum skuldu taka stig til tað.

Restin av skrivinum snúði seg um, at misnøgd var við ymiskt í Kongliga einahandlinum, og at ábøtur tí vóru neyðugar, og so listaði hann nakrar av teimum upp. Endamálið var meira at gera Einahandilin betri enn at avtaka handilin[105]. Tá ið hann var vorðin amtmaður, var tað tí eisini í fyrstu syftu hesa uppgávuna, hann fór undir, men hann lærdi skjótt, at tað gekk nógv seinni at gera ábøtur á handilin, enn hann kundi hugsað sær.

### 8.2.1 Fólksins umboð í handilsmálum

Ein av uppgávunum hjá amtmanninum var at kanna bíleggingarlistan, sum handilsforvaltarin á hvørjum ári skuldi senda til Handilsstjórnina í Keypmannahavn. Tað skuldi hann gera fyri at tryggja sær, at nóg mikið av vøru var í handlinum. Pløyen gjørdi sær stóran ómak við hesum arbeiðinum, eins og undanmaður hansara hevði gjørt, men tá ið skipini komu í 1838, vísti tað seg, at Handilsstjórnin sendi munandi minni av rugi upp til Føroya enn tað, sum stóð á bíleggingarlistanum. Pløyen kannaði málið og fann út av, at Nolsøe handilsforvaltari hevði sent eini boð til Handilsstjórnina, eftir at amtmaðurin hevði góðkent bíleggingarlistan. Í boðunum stóð, at brúk var ikki fyri so nógvum rugi, sum stóð á listanum. Amtmaðurin helt, at handilsforvaltarin á henda hátt gjørdi seg inn á skipanina við, at amtmaðurin skuldi hava eftirlit, og tað gjørdi ikki støðuna betri, at tað serliga vóru embætismenninir, sum skuldu brúka rugið.

Pløyen helt, at hesin mátin at bíleggja í minna lagi av vøru, var „at følge den gamle Praxis", sum snúði seg um, at handilin bara skuldi hava nokk av vøru fram til nýttárs, og so kundi vøra rationerast út á vári, ella handilin bara helt uppat at selja ávísar vørur. Aftan fyri henda gamla hugburðin lá óttin fyri at fáa tap av svinni og spilli. Sjálvur helt hann, at „Enhver Handlendes Ønske maa være, at afsætte saa mange Varer, som muligt", og hann helt eisini, at Einahandilin kundi setast í somu stætt sum aðrir handilsmenn. Harumframt hevði Einahandilin skyldu til at tryggja, at føroyingar altíð høvdu nóg mikið av vørum. Hesa áskoðanina ætlaði hann at greiða nærri frá við komandi skipsmøguleika[106].

Í øðrum brøvum til Handilstjórnina hesar fyrstu dagarnar í mai boðaði amtmaðurin frá, at hann hevði lagt 500 pund av kardústubakki aftur at teimum 1000 pundunum, sum handilsforvaltarin hevði bílagt, tí tað hevði í fleiri ár verið so, at hetta tubakkið hevði manglað allan veturin, og ongin orsøk var til tað, tí eingin vandi var fyri svinni[107]. Harumframt boðaði hann frá, at fleiri

105 TSS. Kopibók fútans 1830-1837, bræv nr. 42 í 1835. Bræv frá Pløyen fúta til Tillisch amtmann dagfest 29. september 1835.

106 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 15. Bræv frá Pløyen amtmanni til Handilsstjórnina dagfest 7. mai 1838.

107 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 23. Bræv frá Pløyen amtmanni til Handilsstjórnina dagfest 9. mai 1838.

føroyingar vildu hava, at siruppur í framtíðini var seldur eftir vekt, sum tað stóð í takstlistanum[108].

26. mai 1838 man næsti skipsmøguleikin hava verið, tí tá skrivaði amtmaðurin Handilsstjórnini eitt longri brævv. Í innganginum greiddi hann neyvt frá, hvørja hugsan hann hevði um handilin og ikki minst, hvør hansara leiklutur var í sambandi við hann. Pløyen skrivaði:

> Allerede tidligere har jeg havt Anledning til at ytre for den ærede Direktion den Overbevisning, som jeg ogsaa endnu nærer: at det kongelige Monopol er den Handelsform, som under nærværende Omstændigheder er den bedste, den mest passende for Færøes Befolkning. Men det er indlysende for Enhver, at et Monopol, hvor liberalt det endogsaa bliver bestyret, dog efter sin Natur, maa medføre mangfoldige Indskrænkninger, maa paa mange Maader, collidere med de Friheder, som Mennesker ere vante til, at betragte som medfødte, og jeg anser det derfor som min Pligt, uden Forbehold at udtale, hvad jeg troer at kunne bidrage til, at gjøre det Monopolet nødvendigen medfølgende Tryk saa lidt føleligt, som muligt.

Hann vísti á, at nógv framstig vóru hend í handlinum, tey 8 árini hann hevði verið í Føroyum. Hetta var serliga í sambandi við lógina frá 1836, tá ið avgjørt varð at stovna úthandlar, at geva fólkunum í handlinum betri løn og seta fleiri fólk, so ikki ov nógv arbeiði lá á teimum. Enn var kortini neyðugt við nógvum øðrum ábótum, og tær høvdu serliga við vantandi góðsku og vantandi nøgd av vørum at gera.

Eftirlitið við góðskuni á føroyskum vørum var sera strangt, og tí átti góðskan á innfluttu vørunum at verið samsvarandi góð, men soleiðis var ikki, tí góðskan var javnan vánalig, sjálvt um tørvurin á góðari góðsku var stórur, av tí at vørurnar skuldu liggja so leingi í pakkhúsinum her. Pløyen visti, at ein slík atfinning fór at verða svarað við, at eftirlit var við innflutningsvørunum í Føroyum, men hann helt ikki, at tað var nøktandi. Eitt var, at tað ikki var sjálvsagt, at ein candidatus juris, sum sorinskrivarin var, skuldi hava gott innlit í vørur, og eitt annað var, at tað móti heysti nyttaði lítið at senda vánaligar vørur retur, tí so komu tær bara at mangla í handlinum allan veturin. Harumframt hevði tað javnan víst seg, at einki hendi, sjálvt um sýnismenninir vístu á manglandi góðsku. Tað hendi t.d., tá ið eftirlitið fann smásteinar í kaffinum, tí tá kaffi kom aftur næstu ferð, vóru framvegis steinar í tí. Pløyen helt, at „flere lignende Mangler ved de Varer, som fra Danmark opsendes hertil, kunne alene rettes ved en strængere Kontrol med Leverandeurerne der.“ Tí var tað serliga forvaltarin við handilin í Keypmannahavn, sum skuldi tryggja, at handilin ikki fekk vørur av vánaligari góðsku, men tað arbeiðið átti at verið gjørt nógv betur. At prógva henda pástandin tók Pløyen fram fleiri dømi um vánaliga vørugoymslu, m.a. var putursukrið, rommið og

108 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 24. Bræv frá Pløyen amtmanni til Handilsstjórnina dagfest 9. mai 1838.



*„Havfruen" var eitt av skipunum hjá Einahandlinum, sum sigldi við vøru millum Føroyar og Danmark. (Mynd: Museum for Søfart)*

skonrugurin av vánaligum slag, og spælikort og knappanálir vóru so vánaligar, at hann ivaðist ikki í, at talan var um vøru, sum ikki kundi seljast í Danmark.

Trupulleikin við vantandi vøru komst av, at hvørki amtmaðurin ella handilsforvaltarin høvdu samvitsku til at bíleggja so nógva vøru, sum brúk kundi gerast fyri, tí at vøran skuldi liggja í fuktigum pakkhúsum, og tá kundi svinnið gerast stórt. Harumframt kom, at eftirspurningurin eftir vørunum svingaði, alt eftir hvussu nógvan pening fólk høvdu um hendi, og serliga tá ið nógvar grindir vóru, kundi eftirspurningurin ávirkast nógv. Trupulleikin var bara, at tað var ógjørligt at vita nakað um gongdina í eftirspurninginum fyrr enn út á heystið, tá ið síðsta skipið fór aftur til Danmarkar, og tá var ov seint at tillaga vørubíleggingina. Pløyen helt, at tað var bara ein loysn upp á henda trupulleikan, og hon var, at handilin skipaði fyri, at eitt skip kom um veturin, t.d. í januarmánaði. Pløyen helt, at hetta var eitt tiltrongt framstig, tí í einum landi við monopoli átti vørumangul ikki at koma fyri. Harumframt vísti hann á, at tað ikki bara vóru embætismenn og hann sjálvur, sum høvdu hesa hugsan, tí „den hele færøske Befolkning føler dybt, at det er et haardt Savn i 6 Maaneder af Aaret at være afsondret fra den øvrige Verden, og føler det saameget stærkere, som det indseer, at denne afsondring ikke er begrundet i nogen absolut Nødvendighed." Tað vísti støðan í Íslandi, har skip komu og fóru alt árið, um ísur ikki legði seg í vegin.

Sum heild helt hann, at hesi hugskot hansara samsvaraðu væl við § 14 í handilslógini frá 13. august 1790, so hann vónandi, at Handilsstjórnin fór at

taka væl ímóti, tí fyri hann var hetta „udgangen alene af min Iver for den færøiske Befolknings Velvære."[109]

Meðan Handilsstjórnin umhugsaði hesi uppskot Pløyens um ábøtur á Einahandilin, fekk hann svar upp á uppskot sítt um at selja sirup eftir vekt. Handilsstjórnin tók undir við Pløyen, og sjálvt um málið ikki hevði stóran týdning, so fegnaðist Pløyen um tað, tí tað hevði stóran týdning hjá fátæka partinum av íbúgvum landsins, og serliga tí, „denne Foranstaltning aldeles streed imod Handelsforvalter Nolsøes Ønsker." Tað var fyri hann váttan um, at Handilsstjórnin tók hansara hugsanir í álvara. Handilsforvaltarin hevði annars sagt við Handilsstjórnina, at avgreiðslan av siruppi var skipað sambært avtalu, sum var gjørd við undanmann Pløyens, men tá ið Pløyen kannaði málið, fann hann onga slíka avtalu, og talan kundi í mesta lagi vera um eina munnliga avtalu við fyrra amtmann Tillisch og Mørch handilsforvaltara, og hann ivaðist ikki í, at hesin mátin varð nýttur, tí hann var lættari fyri handilsfólkið[110]. Hetta er eitt dømi um, at handilin í sínum virksemi setti seg og sín tørv fram um ynskini hjá kundanum, meðan tørvur kundans kom í fremstu røð í teimum uppskotum, sum Pløyen kom við.

### 8.2.2 Handilsstjórnin heldur fast í gamlari siðvenju

Pløyen varð javnan mintur á, at tað var ein røtt avgerð av honum at gera nakað við at bøta um góðskuna á vørunum, sum handilin seldi. Bæði tá ið hann var á ferð kring landið og í Havn, fekk hann dagliga klagur um vánaliga vørugóðsku, og út á heystið 1838 var tað serliga skrátubbakið, sum klagað varð um. Klagurnar vóru so nógvar, at Pløyen noyddist at kanna málið, og tað fekk hann undirtøku fyri frá handilsforvaltaranum. Fútin kom at gjøgnumføra eftirlitið vegna sorinskrivaran, og Pløyen var sjálvur við, og tað var skjótt at staðfesta, at talan var um sera vánaligt tubbak. Møguliga høvdu føroyingar keypt tað fyri minni prís, men tað var so vánaligt, at tað einasta rætta var at senda tað aftur til framleiðaran.

Framleiðarin var Jørgen Bech & sønner, sum seinni fekk ein týdningarmiklan leiklut í Føroyum, tá ið Einahandilin varð avtikin[111]. Tað verður ikki í brøvum Pløyens nevnt beinleiðis, men millum linjurnar ber til at lesa, at tað var alt ov vanligt hjá donskum framleiðarum at senda vøru, sum ikki kundi seljast, har til bar at velja millum fleiri handlar og vørur, til Føroya, tí her noyddust fólk at keypa tað, tey fingu. Tær mongu „klager fra Consumenterne" er eitt gott dømi um, at eisini føroyingar nú vildu hava møguleikan ella valdið til at velja tann frá, sum ikki virdi kundan.

109 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 34. Bræv frá Pløyen amtmanni til Handilsstjórnina dagfest 26. mai 1838.

110 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 57. Bræv frá Pløyen amtmanni til Handilsstjórnina dagfest 10. juli 1838.

111 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 85. Bræv frá Pløyen amtmanni til Handilsstjórnina dagfest 4. september 1838.



*Handilsforvaltarin Jacob Nolsøe og Pløyen amtmaður vóru ósamdir um, hvør rætti mátin var at reka Einahandilin. Henda ósemjan var við til at gera, at amtmaðurin kom til ta niðurstøðu, at Einahandilin var stóra forðingin fyri menning av nýggjum vinnum í Føroyum. (Mynd: Tjóðsavnið)*

Tá ið síðsta skipið var komið til Føroya út á heystið 1838, og amtmaðurin einki svar hevði fingið upp á klagu sína um, at handilsforvaltarin av sínum eintingum broytti bíleggingarlistan, eftir at amtmaðurin hevði góðkent hann, minti hann Handilsstjórnina aftur á málið og helt, at tað var ikki meir enn rímiligt, at hann fekk beinleiðis svar, tí hann royndi altíð at avgreiða spurningar frá Handilsstjórini skjótt og greitt. Pløyen vildi heilt einfalt hava at vita, um handilsforvaltarin hevði rætt til „egenmægtigen at afknappe af Landets Provisioner, naar og hvad han vil“[112].

Burtur úr hesum er týðiligt at lesa, at ein maktkampur var í gongd millum amtmannin og handilsforvaltaran, og tað gjørdist uppaftur sjónligari í langa brævinum, Pløyen skrivaði Handilsstjórnini 5. november, eftir at hann hevði fingið eitt svar frá Handilsstjórnini upp á uppskot síni í brævinum frá 26. mai. Pløyen var vónbrotin av svarinum, tí Handilsstjórnin helt mestsum øll uppskot hansara vóru ógjørlig at gjøgnumføra. Hann grundgav fyri svari sínum soleiðis:

> Jeg skulde næppe have Mod til yderligere at drøfte en Sag, hvori Directionens og min Mening ere hinanden saa aldeles modsatte, dersom denne Sag ikke var af den største vigtighed for en heel Provinds, hvis Talsmand jeg har den Ære at være.

Tað er týðiligt, at trúgvin uppá, at tað við skilagóðum ábótum bar til at laga

112 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 99. Bræv frá Pløyen amtmanni til Handilsstjórnina dagfest 29. oktober 1838.

Einahandilin til tíðina og tey fólksligu krøv, sum gjørdust alsamt týðiligari, var fánað av svarinum hjá Handilsstjórnini.

Viðvíkjandi misnøgdini við vørugóðskuni í Handlinum segði Handilsstjórnin, at tað stóð øllum frítt at bíleggja vørur sjálvur, sum handilsskipini síðani fluttu fyri 25 % av kostnaðinum. Hetta var kortini ein ov bílig undarførsla, tí almúgan var ikki før fyri at bíleggja frá ymiskum donskum umboðsmonnum, og tí vóru tað næstan bara embætismenninir, sum nýttu henda møguleikan. Teir nýttu hann so nógv, at teir bíløgdu næstan alt tað, sum teir skuldu nýta, beinleiðis frá handlum í Keypmannahavn.

Handilsstjórnin helt eisini, at hon tók nóg nógv atlit til tær atfinningar, sum sýnsmenninir komu við, og júst málið við smásteini í kaffinum var ein misskiljing, tí soleiðis skuldi vøran vera. Pløyen helt, at tað var umráðandi, at slíkar upplýsingar komu aftur til Føroya, tí annars slapp misnøgdin bara at halda fram. Hetta „tjener kun til at forbittre Gemytterne mod Monopolet, og jeg tillader mig at sige Sandheden mod sammes Bestyrere." Tað var av stórum týdningi, at almúgan í Føroyum fekk kunning um alt, sum viðkom handlinum, tí

> Det er utroligt, med hvilken Hurtighed Efterretninger om Takstpriser og om Boniteten af enhver ny Tilførsel af Varer udbreder sig over alle Øerne, ligesom ogsaa senere de af Synsretten gjorte Bemærkninger bliver bekjendt og udelt opmærksomhed er henvendt paa, om disse Bemærkninger paaagtes eller ikke.

Steinblandaða kaffið hevði havt stóran almennan áhuga, og tí nyttaði lítið, at Handilsstjórnin visti, at tað átti at vera so, um hon ikki kunnaði um tað.

Eitt annað, sum hevði stóran almennan áhuga, var tað, sum Muhle skrivaði í bók síni um avansuna í Handlinum. Hon átti at verið 33 ⅓ % upp á bæði innflutnings- og útflutningsvørur, men Muhle hevði skrivað, at avansan upp á útflutningsvørur var 50 %, og at føroyingar tí guldu tilsamans 83 ⅓ % í avansu til Handilin, tá ið tey guldu fyri innfluttar vørur við føroyskum vørum. Hetta vildi Pløyen hava greiði á, tí hesi tíðindi „har hos det Folk, hvis Fordeel den angaar, vakt megen Sensation."

Týðiligt er, at áhugin hjá føroyingum fyri handlinum var kveiktur, og at nógvar atfinningarsamar røddir vóru frammi. Pløyen kom at liggja ímillum henda føroyska áhugan og áhugamálini hjá Handlinum, og so hvørt sum tað gjørdist honum greitt, at hann ikki megnaði at samansjóða áhugamálini, endaði tað við, at hann fór longri og longri burtur frá einahandilshugsanini, tí hansara uppgáva var í størri mun at arbeiða til frama fyri almúguna, sum hann var settur at stýra.

Í brævinum vísti Pløyen á, at síðsta nævurið úr Noregi var vánaligt, og hann mælti til, at handilin seldi tað fyri ein bíligari prís, og at kostnaðurin varð lagdur á leverandørin. Hesum tók Handilsstjórnin ikki undir við, og Bjørn konsul, sum var leverandørur, helt, at Pløyen misbrúkti sítt embætisvald. Aftur her kemur undan kavi, sjálvt um tað ikki verður sagt beinleiðis, at stóri áhugin hjá Pløyen órógvaði bæði Handilsstjórn og leverandørar, og tað er lætt at fáa illgruna um,

at talan í veruleikanum var um, at Pløyen á henda hátt kom at gera seg inn á teir, sum misnýttu skipanina til egið gagn við at senda vørur til Føroya fyri at fáa fullan prís fyri tær, sjálvt um tær vóru so vánaligar, at tær áttu at verið seldar fyri nógv lægri prís ella burturbeindar.

Viðvíkjandi vørugóðskuni hevði Pløyen gjørt eina spurnarkanning millum embætismenninar, sum hann helt vera óvildugar, tí teir keyptu tað mesta beinleiðis úr Danmark. Millum embætismenn var semja um, at flestu vørurnar vóru „middelmaadige“, og nakrar vóru „slette“. So galið var tað, at sjálvt handilsforvaltarin bílegði sær sjálvum nógvar vørur beinleiðis úr Danmark, tí tær vørurnar vóru so nógv betri, enn tær hann seldi í handlinum. Eitt gott við vørugóðskuni skuldi kortini nevnast, og tað var, at kornið var sum heild gott, sum kom til Føroya.

Handilsstjórnin gjørdi í sínum svari greitt, at hon ikki fór at taka stig til at senda nakað handilsskip til Føroya um veturin. Orsøkin var ringu royndirnar av eini ferð hjá handilsskipinum „Venus“ 14 ár frammanundan. Pløyen royndi at vísa á, at tað skipið ikki var nakrar góður siglari, og at onnur skip høvdu øðrvísi royndir at vísa á. Hann helt eisini, at tað var skeivt at spyrja skipararnar, tí teir tímdu sjálvandi ikki at gera ein eyka túr um veturin fyri somu løn. Fingu skipari og manning løn fyri at gera ein túr í januar, ivaðist hann ikki í, at teir gleðiliga høvdu gjørt tað. Um trupulleikin var, at tað var ov langt at sigla heilt úr Keypmannahavn, so kundu aðrar farleiðir roynast, sum til dømis at gera eina ferð um veturin úr Hetlandi til Føroya. Í Hetlandi hevði danski konsulin Ogilvy boðið seg fram til at skipa fyri eini slíkari loysn, og Pløyen ivaðist ikki í, at har bar til at fáa nógvar vørur, og helst vóru tær eisini bíligari enn í Danmark[113].

Júst hetta við Hetlandi var nakað, sum fekk stóran týdning fyri Pløyen komandi árið, tá ið hann saman við trimum føroyingum fór á eina ferð, sum er vorðin tiltikin í føroyskari søgu. Men áðrenn teir fóru á Hetlandsferðina, sum greitt verður frá í næsta kapitli, hevði Pløyen gjørt upp við seg sjálvan, at hann skuldi standa á odda fyri einari broyting av viðurskiftunum, sum høvdu staðið í stað í so langa tíð. Henda broyting fór at merkjast og fór at fáa stóra ávirkan á føroyska fólkið, bæði í hugsan og materielt. Eftir at hava eygleitt Føroyar, sum tær nú vóru, og eftir gjølliga umhugsan um, hvat Føroyar kundi blíva til, tá „de fornødne Friheder til Kræfternes Udvikling tilstaaes“, var hann komin til ta niðurstøðu, at menning av nýggjum vinnuvegum var ógjørlig, um Einahandlin skuldi halda fram óbroyttur[114]. Ein broyting av einahandilsskipanini gjørdist tí ein grundleggjandi partur av ætlanunum hjá Pløyen amtmanni um at fáa ment eina fiskivinnu.

113 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 102. Bræv frá Pløyen amtmanni til Handilsstjórnina dagfest 5. november 1838.

114 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 137. Bræv frá Pløyen amtmanni til Rentukamarið dagfest 26. februar 1839.

## *8.3 Uppskot Pløyens um eina fiskivinnu 26. februar 1839*

Knapt hálvtannað ár eftir, at Pløyen sum amtmaður spurdi fýra av sínum tættastu samstarvsfeløgum, hvat teir hildu um møguleikarnar fyri einari komandi fiskivinnu, var hann klárur at taka samanum. Tað gjørdi hann í einum áliti, sum varð dagfest 26. februar 1839. Hetta álitið gjørdist á mangan hátt stevnan fyri strembanina eftir at fáa gongd á fiskivinnu komandi tíðina, og tí er vert at hyggja eitt sindur gjølliga at tí.

Pløyen ásannaði í langa brævinum til Rentukamarið, at Einahandilin var størsta forðingin fyri menning av nýggjum vinnum í Føroyum. Alt skuldi keypast gjøgnum hann, og tað gjørdi tað sera dýrt at reiða skip út. Fiskurin skuldi eisini seljast gjøgnum Einahandilin, men har vóru prísirnir so lágir, at tað bara var áhugi fyri at avreiða turran fisk. Turrur fiskur var ikki rætta vøran hjá deksførum at arbeiða við, tí tá skuldi fiskurin í land, áðrenn hann var tvey døgn gamal. Prísurin á klippfiski var settur til tríggjar skillingar fyri pundið, og avleiðingin av tí var, at ikki eitt einasta pund varð virkað til klippfisk síðsta árið.

Klippfiskur var gjørdur til takstvøru í 1837, tá ið prísurin var 4 skillingar fyri pundið, men árið eftir fór prísurin niður á 3 skillingar. Pløyen fanst at hesum og helt, at tá ið klippfiskur nú var takstvøra, var tað skyldan hjá handlinum at hava ein prís, sum eggjaði til at seta gongd á hesa nýggju vinnuna, sjálvt um tað kostaði handlinum pening. Hann greiddi frá, at føroyska Landhuusholdningsselskapið fyri nøkrum árum síðani tók stig til fáa klippfisk virkaðan í Føroyum. Talan var ikki um stórar mongdir, men úrslitið var gott. Klippfiskaframleiðsla átti at verið stuðlað, t.d. við ikki at kravt tann galdandi og høga fraktprísin, tá ið klippfiskur varð útfluttur.

Hann helt, at tá ið framleiðsla av nýggjari vøru byrjaði at vaksa, ráddi um at sleppa undan, at vøran gjørdist takstvøra hjá Einahandlinum, tí tá varð „en uoverstigelig Grændse for al Industri med den Gjenstand“ íkomin. Orsøkin var, at um vøran varð takstvøra, so fekk hon ein fastan prís, og tað bar ikki til at fáa hann hægri, líkamikið hvussu væl frágingin framleiðslan var. Varð vøran vrakað, so fekk hon annaðhvørt vrakprís ella varð als ikki móttikin. Úrslitið varð, at málið við øllum arbeiði varð at koma so stutt upp um vrakingarmarkið, sum til bar.

Pløyen vísti eisini á órímiligu prísirnar, tá saltfiskur skuldi seljast. Ein tunna av saltaðum toski gav 6 ríkisdálar, men tilfarið til tunnuna kostaði 2 ríkisdálar og 32 skillingar. Roknaði man við 2 skeppum av salti til tunnuna, so kostaðu tær 80 skillingar. Bøkjarin skuldi hava eini 16 skillingar, so samanlagt var útreiðslan 3 ríkisdálar og 32 skillingar, so alt seljarin fekk fyri fiskin, sítt arbeiði og slit av reiðskapi var 2 ríkisdálar og 64 skillingar. Harumframt skuldi hann tvær ferðir til handilsstaðið; fyrst eftir tunnu og salti og so aftur fyri at avreiða. Føroyingar vóru sera umhugsnir, tá ið talan var um vinning ella undirskot, og tí var eingin, sum fekst við at selja saltfisk undir hesum umstøðunum. Einasti máti at fiska við



*26. februar 1839 skrivaði Pløyen amtmaður álit um møguleikarnar fyri einari komandi fiskivinnu í Føroyum. Hetta álitið setti út í kortið, hvussu fiskivinnan kundi mennast og gerast ein fyrireiking til, at Einahandilin kundi avtakast.*

vinningi var sostatt at avreiða turran fisk, men tað forðaði so fyri menningini av rættiligari fiskivinnu við deksførum. Handilin forðaði sostatt upp á fleiri mátar fyri menningini av einari fiskivinnu, og tað var ikki sørt óheppið, tí menningin av fiskivinnuni var av allar størsta týdningi fyri framtíðina í Føroyum.

Pløyen greiddi frá, at allar royndir at fiska við deksførum higartil vóru „aldeles mislykkede“. Hesar royndir byrjaðu allar við teimum bestu vónum, og nógvur peningur og nógv orka varð løgd í ætlanirnar, men einki vildi bera til. Ein av frágreiðingunum uppá, hví tað gekst so illa, var, at „Ligesom Almuemanden i Almindelighed hænger fast ved det gamle, og betragter alt Nyt med Mistroe, saaledes er det naturligt, at den færøiske Almuesmand i høieste Grad har denne Tendents, da han, ifølge Lovbud, i Aarhundreder har været nødsaget til at skye Fremmede, og ved sit Lands beliggenhed er aldeles isoleret.“ Siður var við øðrum orðum ringur at broyta í Føroyum.

Ein siðvenja, sum hevði sín uppruna í bátinum, var, at føroyingurin var vanur at koma til lands hvørt kvøld. Tá sást beinanvegin, hvat kom burturúr. Var nógv at fiska, var føroyingurin óvanliga úthaldin, men um einki var at fáa, so sótu teir heima, sjálvt um einki var at gera har, heldur enn at fara út at royna aftur. Hesin vanin var fínur til útróður, men tá ið hann varð fluttur umborð á deksfør, var hann skaðiligur. Fiskimenninir sóu onga meining í at vera umborð, tá ið einki var at fáa, og teir bóðu skiparan fara í havn. Tá ið so fiskaríið broyttist, og veðrið varð gott, skuldi deksbáturin brúka tíðina upp á at sigla við lítlum og ongum vindi aftur á fiskileið, sum annars átti at verið nýtt til at fiska í.

Føroyingar vóru framúr sjómenn fram við landi, men teir flestu vóru meir ella minni fyri ongum, tá ið teir komu umborð á eitt skip, tí teir dugdu ikki at meta um, hvussu nógv meir eitt skip toldi av, enn báturin gjørdi, og teir noyddust eisini at viðganga, at teir ikki høvdu førleikan ella royndirnar til at gera sína matrósskyldu so skjótt, sum hon skuldi gerast, tá ið manererast skuldi við einum skipi. Tað hevði við sær, at so hvørt sum fiskivinnuroyndirnar miseydnaðust, so styrktust tær røddirnar, sum søgdu, at føroyingar hvørki dugdu at fiska ella sigla við skipi, og at teir tí skuldu halda fast í fedranna siði.

Ein annar trupulleiki við føroysku manningunum var, at tað bara vóru „den usleste, mest fordærvede Deel af Almuen, der hidtil har forsøgt Fiskeriet fra Dæksfartøierne." Hjá teimum skipum, sum fiskaðu kring Føroyar, var vanligt at løna manningini við einum parti av veiðuni ella við einum prosentparti av landaða virðinum. Tað hevði við sær, at manningin gjørdi alt fyri at fáa so nógv burturúr, sum til bar. Hesar treytir høvdu ikki freistað nakran føroying til at royna fiskivinnuna, og tí var tað bara fátækasti parturin av almúguni, sum fekst at manna skipini. Hesir livdi som dagleigarar, teir høvdu ofta famliju, og tí kravdist, at teir fingu eina løn, sum kundi breyðføða familjuni, meðan teir sjálvir vóru burtur. Teir, sum áttu nakað av jørð, støðaðust ikki umborð í meir enn ein ella tveir dagar. Manningin fekk mat og eina lítla fasta hýru, men tað gjørdi so aftur, at manningin royndi at arbeiða so lítið, sum til bar, og tí komu skipini at liggja longri í havn enn úti á miðunum.

Støðan var enn sum áður, at fiskur hevði stóran týdning fyri føroyingar. Serliga norðanfyri hevði várfiskurin so stóran týdning, at í Norðoyggjum og stórum pørtum av Eysturoy var eingin arbeiðsførur maður, sum hevði tørv á almennari hjálp. Men ein ment fiskivinna var besti mátin at menna landið. Tí átti tað at verið „et varmt Ønske for Enhver, hvem Færingernes Vel er magtpaaliggende, om muligt at medvirke til at hæve Fiskeriet over sit nuværende, lave Standpunkt, at faa Færingerne satte istand til, i passende Fartøier at hente Næring og Udstand der, hvor baade Nødvendigheden og Naturen har givet den Anvisning dertil."

Eingin ivaðist longur í, at stórir møguleikar vóru í eini fiskivinnu, tí útlendsk skip í hópatali fiskaðu áhaldandi undir Føroyum og Íslandi, og tey kundu gera upp til tríggjar túrar á fleiri hundrað míl aftur og fram og framvegis hava vinning. Frá fransmonnum hevði Pløyen skilt, at bara í Dunkerque livdu so nógv av hesum fiskinum, at tað svaraði til alt fólkatalið í Føroyum. Føroyingar vóru ónøgdir við, at útlendingar fóru avstað við øllum hesum fonginum, og ynskið um at sleppa at kappast við hesar útlendingar var alsamt vanligari at hoyra, so nú var tíðin komin til „at hæve en dansk Provinds fra Umyndighed til Selvstændighed".

Í spurningum sínum til fútan og sorinskrivaran hevði Pløyen spurt, um teir hildu tað vera rættast at reka fiskivinnu fyri kongsins ella fyri privata rokning. Um privatir skuldu reka vinnuna, var spurningurin, hvørjar fyrimunir teir skuldu hava, og um tað bar til við slíkari vinnu, uttan at tað gekk út yvir Einahandilin,

og at enda var spurningurin, hvussu stórur rakstrarkapitalur var neyðugur fyri at reka slíka vinnu.

Pløyen var samdur við fútanum og sorinskrivaranum í tí mesta, sum teir bóru fram. Hann ásannaði, at við takstunum kundi Einahandilin avgera, hvør vinna loysti seg best hjá føroyingum, og tí var øll vinna í veruleikanum rikin fyri kongliga rokning. Um Einahandilin framhaldandi skuldi virka „i sin fulde Udstrækning", bar fiskivinna bara til, um hon var rikin av tí almenna, men um privatir fingu størri frælsi, „anseer jeg det i eenhver Henseende for det bedste og ønskeligste, at det Offentlige aldeles ikke befatter sig ved denne Sag."

Pløyen var kortini ikki samdur við sorinskrivaran um, at tað fór at verða so skaðiligt, at danskir keypmenn fingu møguleikan at virka í føroyskari fiskivinnu. Hann dugdi ikki at síggja, at „Færøernes Indbyggere i mindste Maade præjudiceres derved, at flere, eller endogsaa mange Danske driver Fiskeri herfra Øerne", tí tað fór at geva fleiri føroyingum møguleika at útbúgva seg til sjómenn og fiskimenn, og við tíðini fór tað at hava við sær, at ein lægri miðalstætt vaks fram. Pløyen helt, at „den simple Mand fatter desuden efter mine Erfaringer lettere en Sag, naar han seer den med det legemlige Øie, end naar han skal alene have een intellektuel Anskuelse af den." Besti mátin hjá føroysku almúguni at síggja fiskivinnuna við sínum egnu eygum var, at nakrir danir við nóg mikið av kapitali og førleika fingu møguleika at vísa teimum fyrimunirnar við fiskivinnu við størri fiskiførum.

Niðurstøðan hjá Pløyen var:

> at der maatte tillades Enhver, saavel Dansk som Færing, som herfra Øerne vil drive Fiskeriet ved Dæksfartøier, hertil at indføre, enten paa egne eller fragtede Skibe, og ligemeget fra hvilken Plads, saadanne Gjenstande, som til Fiskeriets Drift ere fornødne, fx. Tømmer, Tougværk, Tjære, Seildug, Jern, Fiskeredskaber, Salt og Skibsprovisioner, og paa samme Maade at udføre, enten til Danmark eller til fremmede Sted tørret, saltet eller klippet Fisk og Tran. At der, tilligemed denne Concession maatte følge en fuldkommen indbyrdes Frihed i Handel og Vandel mellem Indbyggerne og de etablerede Fiskere, med hs. til saadanne Gjenstande, som ere fornødne til Fiskeriernes Fremme og som ere Productet af Fiskerie, antager jeg for at maatte blive en selvfølge.

Sjálvt um Pløyen mælti til hesi frælsini, vildi hann fegin varðveita Einahandilin á øðrum økjum, tí hann helt tað vera vandamikið í einum at loysa øll bond, sum høvdu verið bundin í øldir[115].

Allar teir tríggir hægstu embætismenninir í Føroyum vóru sostatt samdir um, at Einahandilin var fremsta forðingin fyri framburði í Føroyum, og at rætti vegurin fram var, at fiskivinna fekk møguleika at menna seg uttan fyri einahandilsleinkjurnar. Tað var besti og møguliga einasti máti at menna landið, so at tað við tíðini varð til reiðar til fullkomnan fríhandil.

---

115 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 137. Bræv frá Pløyen amtmanni til Rentukamarið dagfest 26. februar 1839.

Einki sæst til, at Rentukamarið nakrantíð svaraði uppskotinum hjá Pløyen og embætismonnum hansara beinleiðis, men tað er týðiligt, at hetta tilmælið hjá Pløyen setti gongd í ymisk átøk komandi árini. Við hesum skjalinum var tað í øllum førum greitt, at menning av einari fiskivinnu, sum kundi fyrireika føroyska samfelagið til eina tíð við fríum handli, lá frammarliga í huganum á hægstu embætismonnunum í Føroyum.

## *8.4 Samandráttur*

Tá ið Christian Pløyen tók við amtmansstarvinum eftir F.F. Tillisch, fingu Føroyar ein amtmann, sum hevði enn størri hug til at gera sítt til at menna eina rættiliga fiskivinnu í Føroyum. Meðan Tillisch vildi hava leiklutin hjá tí almenna so lítlan, sum til bar, var Pløyen vísur í, at tað var tað almenna, sum skuldi taka fyrstu stigini, um nakað skuldi henda. Tí var ein av fyrstu ætlanum hansara at gera eitt uppskot til, hvussu fram skuldi farast.

Pløyen spurdi seg fyri hjá sínum embætisbrøðrum í Havn, og bæði Lunddahl fúti og Hunderup sorinskrivari vóru samdir við honum í, at fiskivinnan var rætti vegurin at fara at menna landið. Hinvegin vóru teir báðir eisini vísir í, at Kongligi einahandilin var stóra forðingin fyri, at nakað hendi, men tí var Pløyen ikki heilt samdur í at byrja við. Hann helt Einahandilin hava stóran týdning, ikki minst fyri tey fátøku í Føroyum, og tí vildi hann helst ganga eina leið, har Einahandilin var mentur, soleiðis at hann kom at samsvara við tíðarinnar krøv. Gjøgnum alt árið 1838 royndi Pløyen at ganga hesa leið við ymiskum uppskotum um ábøtur á handilin, men hann noyddist fleiri ferðir at ásanna, at tað var alt annað enn lætt at broyta handilin. Tað merkti so eisini, at handilin ikki vildi gera sítt til at minka um alsamt vaksandi ónøgdina við handilin, sum var millum fólk, og tí noyddist Pløyen at velja, um hann skuldi verja verandi handilsskipan, ella hann skuldi arbeiða til frama fyri fólkið.

Tá ið Pløyen 26. februar 1839 setti seg at skriva sítt uppskot um, hvussu ein fiskivinna kundi mennast í Føroyum, var týðiligt, at hann ikki longur dugdi at síggja nakran serligan fyrimun í Einahandlinum. Hann var nú nógv samdari við fútan og sorinskrivaran, enn hann upprunaliga hevði verið. Sjálvt um einki beinleiðis aftursvar er upp á álitið hjá Pløyen frá februar 1839, so er lítið av ivast í, at tað við hesum uppskoti endaliga varð sett út í kortið, at ein fiskivinna skuldi mennast í Føroyum, so at landið á tann hátt gjørdist til reiðar at taka við fríum handli, tá ið ein tíð var fráliðin.

# *9. kapittul*
# *Hetlandsferðin*

Tá ið Pløyen á veg til Danmarkar á sumri 1836 sigldi fram við Hetlandi, fekk hann hugskotið at fara hagar at kanna, hvussu tað bar til, at fólkatalið í Hetlandi var so nógv størri enn í Føroyum, tá ið landafrøðiligu umstøðurnar annars líktust so nógv. Hann søkti um at fáa stuðul og loyvi til hesa kanningarferð, longu meðan hann var í Keypmannahavn tað árið, men í teirri umsóknini varð lítið og einki skrivað um fiskivinnu. Pløyen loyvdi sær bara at „antyde", at hetlendingar útfluttu nógvar túsund tunnur av sild, meðan føroyingar „næppe fange een Tønde"[116]. Ikki eitt orð varð skrivað um tosk. Pløyen fekk loyvi, men av ymiskum orsøkum gjørdist ferðin ongantíð til nakað.

Nú, tá ið amtmaðurin hevði sett út í kortið at fáa gongd á eina fiskivinnu í Føroyum, vaks áhugin fyri at gera kanningarferðina til Hetlands aftur, tí í Hetlandi var ein blómandi fiskivinna, og hetlendsk fiskiskip vóru javnan í Føroyum. Pløyen avgjørdi at taka tveir føroyingar við sær, so teir kundu læra seg so nógv sum til bar um fiskiveiðu og fiskavirking, meðan teir vóru har. Teir skuldu við øðrum orðum bera kunnleikan til nýggju vinnuna við sær til Føroya. Pløyen valdi at taka óðalsmenninar Pól á Látrinum á Eiði og Poul Joensen í Nólsoy við sær, og ein orsøk til, at valið fall á júst teir, mundi vera, at spírar til eina fiskivinnu høvdu verið at sæð í hesum bygdum. Umframt teir báðar spurdi Mourits Mohr, ungi kongsbóndin í Hoyvík, um hann kundi sleppa við, og tað slapp hann, tí Pløyen helt, at tað serliga fyri ein so ungan mann fór at gera mun at síggja, hvat hetlendingar gjørdu[117].

## *9.1 Hetlendsk fiskivinna*

Teir fýra fóru av Havnini 1. juni, og tá ið „Hector" 2. juni 1839 misti land úr sýni á leiðini til Hetlands, fór Pløyen at hugleiða um, hvussu kærkomið tað var at síggja onnur skip á opnum havi. Á hesari leiðini vóru kortini fá onnur skip enn fronsk og hollendsk fiskiskip, og tey „ere mig en Torn i Øiet, idetmindste saalænge, indtil Færingerne ere istand til at møde dem under gunstigere Betingelser, end nu er Tilfældet." (Pløyen 1966: 4).

Tríggjar dagar seinni sigldi „Hector" fram við Sumburgh Head, og á leiðini millum suðurenda Hetlands og Fair Isle lógu smáar sluppir og stórir tvímastraðir

116 TSS. Fútasavnið. Kopibók fútans. Brøv frá Danmarkarferð 1836, nr. 4. Bræv til Rentukamarið dagfest 5. august 1836.

117 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 164. Bræv til Rentukamarið dagfest 30. apríl 1839.



*Pløyen og hansara menn sóu bátar og sluppir í hópatali liggja og fiska, tá ið teir komu til Hetlands. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

bátar í hópatali og fiskaðu. Nærri landi gjørdu smærri bátar tað sama, og tað var júst eina slíka sjón, Pløyen kundi hugsað sær at sæð í Føroyum, men hann „maatte ogsaa med en vis smertelig Følelse erindre, hvor ufuldkomment Færingernes Fiskeri er, hvormange Vanskeligheder den have at overvinde, inden det kan hæves til det Punkt, hvortil det kan og bør komme." (Pløyen 1966: 5).

Tær sluppirnar, sum Pløyen sá sunnan fyri Sumburgh Head, vóru partur av teirri blómandi hetlendsku toskaveiðuni, sum greitt er frá í kapitli 6. Har er eisini greitt frá, at hetlendska fiskivinnan kom í stórar trupulleikar tíðliga í 1830-árunum, og tað vóru helst hesar torføru umstøðurnar, sum trýstu hetlendingar at royna nýggjar møguleikar. Ein av teimum var at royna toskabankarnar undir Føroyum. George Hay sendi onkrar sluppir til Føroya í 1832 og 33, men tað er ógreitt, hvør fyrsta hetlendska sluppin í Føroyum var, hvat ár hon royndi nýggja møguleikan, og hvat kom burturúr (Goodlad 2014: 96).

Til hesa ritgerðina er ongin roynd gjørd at finna fyrstu hetlendsku sluppina í Føroyum, men 12. juni 1833 vóru tvær komnar til Vágs. Skipararnir boðaðu frá, at teir vóru komnir inn at salta fiskin, og teir guldu kravda akkerspeningin við salti, áðrenn teir fóru avstað aftur 15. juni[118].

Árið eftir sendi stóra hetlendska fyritøkan Hay & Ogilvy bræv til amtmannin, har teir boðaðu frá, at teir ætlaðu sær at senda seks sluppir til Føroya. Skipararnir høvdu fingið at vita, hvussu teir skuldu bera seg at, um neyðugt var at leggja at landi í Føroyum. Sluppirnar itu „Barbara", har George Wishart var skipari, „Cathrine", har Arthur Pottinger var skipari, „Minna", har Robert Irvine var skipari, „Plover", har George Johnson var skipari, „Curlew", við Robert Christie sum

118 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra G, bræv nr. 145. Bræv frá Evensen sýslumanni dagfest 31. juli 1833.



*Hetlendskar sluppir fóru í 1830-árunum at royna eydnuna í føroyskum sjóøki.*

skipara og „Peterhead Paelet", sum Duncan Gill var skipari á. Tvær av sluppunum, „Barbara" og „Cathrine", høvdu skifursteinar við sær, sum Edmondston hevði selt Einahandlinum[119].

Føroysku grunnarnir fingu sera stóra ávirkan á hetlendska toskafiskiskapin (Goodlad 2014: 95). Eftir vánaliga fiskiskapin í 1835 var stór framgongd árini 1836-1838, tá ið veiðan øktist 17 ferðir í mun til 1835, men tað ber ikki til at siga, hvussu stórur partur av hesi framgongdini stavaði úr Føroyum. Í hvussu er datt hetlendski fiskiskapurin undir Føroyum stutt eftir niðurfyri aftur eina tíð, áðrenn teir aftur komu henda vegin í 1849 (Goodlad 2014: 97). Fyrstu royndirnar vóru tí ikki nakar varandi fongur, og tað komst møguliga av, at skipini vóru ov smá, at vitanin um føroysku grunnarnar var ov lítil, ella fall tað bara saman við vánalig fiskiár í Føroyum (Goodlad 2014: 123).

## *9.2 Hay & Ogilvy*

Hetlendska fiskivinnan stóð í besta blóma, tá ið føroyingarnir og Pløyen komu í land í Lerwich. Á kaiini var danski varakonsulin Charles Ogilvy komin at taka ímóti teimum, og hann var so blíður, at skjótt gloymdi Pløyen alt um, at hann var í einum fremmandum landi (Pløyen 1966: 10). Í Hetlandi sá alt ríkari út,

---

119 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra G, bræv nr. 480. Bræv frá Hay & Ogilvy til amtmannin dagfest í Lerwich 3. mai 1834.




*Hay og Ogilvy høvdu bygt sær kai og fleiri vinnuhøli, tá ið Pløyen var og vitjaði. Hetta var seinni útsýnið av kaiini hjá teimum niðan móti Town Hall.*
*(Mynd: Shetland Museum and Archives)*

og „alt lod mig føle, at jeg var kommen til Rigdommens Land“, og tað frøddi hann, at „alle de Penge, som Shetlænderne anvende paa Landet, hentes op af Havet, en Kilde, som Gud være lovet! er ligesaa tilgængelig for os, som for dem.“ (Pløyen 1966: 14). Spurningurin var bara, hvussu gongd kundi fáast á at oysa ríkidømi úr kelduni.

Ogilvy átti stóran part av heiðurinum fyri hetta ríkidømið, tí hann var annar parturin í størsta hetlendska vinnufelagnum, sum æt Hay & Ogilvy, og tað var fyritøkan, sum átti flestar sluppir í Hetlandi í 1830-árunum (Goodlad 2014). Pløyen og hansara menn vóru í so máta komnir til tann heilt rætta.

Í kapitli 6.3 er greitt frá, at James Hay var ein av teimum, sum kláraði seg væl sum handilsmaður síðst í 18. øld. Hann fekst serliga við at útflyta turran fisk og innflyta timbur úr Noregi. James fór eisini upp í smuglingina, tá ið kríggj í Evropa forðaði vanliga handlinum, men eisini hesin møguleikin hvarv árini 1807 til 1814, tá ið bretski sjóstongsulin steðgaði øllum sjóvegis sambandi við Evropa.

Sonur James Hay, William Hay, giftist í 1811 við Margaret Ogilvy, og saman við verfaðiri sínum Charles og tveimum svágrum stovnaði hann Hay & Ogilvy í 1822. Charles Ogilvy, sum tók ímóti Pløyen, var annar av svágrunum, og hann æt tað sama sum pápin. Felagið Hay & Ogilvy bygdi Blacksness molan og fiskastøðina í Scalloway, sum fekk stóran tydning fyri alla vinnuna í 19. øld (Goodlad 2014). Teir bygdu eisini kaiir, skipasmiðju, pakkhús og annað í Freefield í Lerwich, har teir stóðu fyri útflutningi og innflutningi av hópin av vørum. Nevnast kann t.d., at tað var henda fyritøka, sum tók stig til at flyta út



*Eisini í Scalloway hevði fyritøkan hjá Hay & Ogilvy nógv virksemi við Blacksness molan. Í langa húsinum varð klippfiskur og ísur goymdur. Salttunnur og útgerð til fiskavirkingina liggur framman fyri húsið. Til vinstru hongur klokka, sum ringdi arbeiðsboð til verkafólkið, og bygningurin uttast til vinstru er handilin hjá fyritøkuni. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

livandi kýr og hestar, og í 1822 høvdu teir avgerandi leiklut í, at the Shetland Bank varð stovnaður (Nicolson 1982: 6).

Hay & Ogilvy hevði umfatandi fiskivinnuvirksemi kring alt landið. Eitt av hesum støðunum var oyggin Burra, nakað sunnan fyri Scalloway. Pløyen og hansara menn komu til Hetlands fyrst í juni, og tá lá væl fyri at síggja, hvussu hetlendingar fiskaðu tosk og longu, og hvussu hesin fiskur varð virkaður til klippfisk. Pløyen avgjørdi, at føroyingarnir skuldu setast í læru hjá besta fiskavirkaranum hjá Ogilvy, áðrenn hann sjálvur fór víðari (Pløyen 1966: 17).

Mr. Pennant var tiltikin fyri at vera frægasti fiskavirkarin í Hetlandi, so leiðin gekk skjótt út í oynna Burra, har Pennant arbeiddi. Teir fóru allir út á Burra 7. juni, og tað, teir sóu, vakti ikki sørt av áhuga. Pløyen lýsir komu teirra hagar soleiðis:

> Burra viser sig strax som en Fiskerstation; uhyre Stabler af Klipfisk laae paa Stranden, og mangfoldige Fruentimmer og gamle Mænd vare ifærd med at sammenstakke den store Mængde af halvfærdige Klipfisk, som laae der, fordi Himlen truede med Regn. Den gamle Fiskebereder, som jeg var anbefalet til, Mr. Pennant, gik omkring og passede paa, at Arbeidet blev godt gjort, og jeg havde nu strax Leilighed til at gjøre hans Bekjendskab og anmode ham om, at lære mine medfølgende Færinger sin Haandtering. Han var særdeles villig hertil, og det var tydeligt, at den gamle Mand følte sin Værdighed, idet han, som

> en Professor, skulde holde et Foredrag for en Deputation fra et fremmed Folk; han beklagede os, fordi vi endnu vare i Konstens Barndom, og alene tilberedte Stokfisk, men han tilføiede nogle opmuntrende Ord, at silde var bedre end aldrig, og at det skulde være ham en Fornøielse, om han kunde bidrage til sine gamle Landsmænds Fremskridt i denne vigtige Næringsvei (Pløyen 1966: 23–24).

Eins og Pennant royndi Ogilvy heldur ikki at fjala nakað, tí hann greiddi frá øllum tí, sum hann kundi greiða frá, um klippfisk og fiskivinnu, og Pløyen var ovfarin av, hvussu opin hann var, sjálvt um hann kundi rokna við at fáa ein kappingarneyta longri norðuri (Pløyen 1966: 17).

Fyrstu løtuna virkaði Pløyen sum tulkur, tí føroyingarnir skiltu bara nøkur fá orð. Hann greiddi mr. Pennant frá, at teir vildu „lægge Haand paa Værket i dets Enkeltheder“ gjøgnum alla framleiðsluna, frá tí fiskurin varð fiskaður, til hann var góð søluvøru. Hesa mannagongd vildu teir gjøgnumganga, líka til Pennant kundi siga, at teir dugdu tað.

Meðan teir tríggir føroyingarnir vóru á Burra, fingu teir fleiri ferðir høvi at fara út við bátunum, sum róðu út á hav. Har lærdu teir at seta línu og draga hana innaftur.

## *9.3 Eygleiðingar av royndum hetlendinga og møguleikar í Føroyum*

Pløyen og fylgdarmenn hansara sóu, at hetlendsk fiskivinna var í tveimum. Annar parturin var sluppir á 200 til 500 tunnur, og hin var havútróður við bátum, sum mintu um teir føroysku.

### 9.3.1 Sluppfiskiskapur

Sluppirnar fiskaðu mest um veturin og um várið. Vetrarfiskurin varð førdur livandi til London, tí um veturin var veðrið ikki til vildar at virka klippfisk. Hesin møguleikin at flyta fiskin livandi ella feskan til London fór helst ikki at verða ein møguleiki hjá eini komandi føroyskari vinnu. Hinvegin bar til at halda fram at turka fisk um veturin, eins og gjørt hevði verið higartil.

Á sluppunum átti manningin sjálv reiðskapin, og veiðan varð býtt í tveir partar. Reiðarin átti annan partin, og manningin hin, og ofta avtalaðu manningarnar við reiðaran, at hann skuldi keypa fiskin frá teimum. Stóri fyrimunurin, sum hetta gav hetlendska fiskimanninum fram um tann føroyska, var, at hetlendingar beinanvegin vóru leysir av fiskinum, meðan føroyingurin sjálvur noyddist at virka hann. Tað gjørdi, at føroyski útróðrarmaðurin misti fleiri dagar á sjónum, og hann var á ongan hátt førur fyri at fáa til vega hús og annan útbúnað, sum skuldi til at gera eina betri vøru, og av tí sama fór nógvur fiskur til spillis á hvørjum ári (Pløyen 1966: 26). Hetta er ein einføld lýsing av, hvussu hetlendingar fingu



*Teir tríggir føroyingarnir, sum vóru við Pløyen á ferðini, fingu á oynni Burra høvi til at seta seg væl inn í hetlendska fiskivinnu. Har fingu teir roynt bæði at seta línu og at turka saltaða fiskin til klippfisk. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

fyrimun av einum arbeiðsbýti, sum eyðkendi kapitalistiska samfelagið. Ein fyrimunur, sum føroyska samfelagið enn ikki hevði fingið gagn av, men sum eyðkendi komandi tíðir.

Ein hending, sum gjørdi, at gestirnir úr Føroyum av álvara sóu, hvat fór til spillis, av tí at fiskivinnan var so lítið ment, var ein slupp úr London við 8 monnum, sum tvær ferðir landaði hjá Hay & Ogilvy í Scalloway. Fyrru ferð landaði hon 9.000 toskar, og aðru ferð 5.000. Hesin fiskur var fingin upp á minni enn ein mánað í ein útsynning úr Suðuroy. Soleiðis fingu bæði sluppin og hetlendska fyritøkan nakað burturúr, „medens vi sidde rolige med Hænderne i Skjødet, og kun beklage, at vi Intet fiske." Pløyen mátti viðganga, „at enhver Draabe patriotisk Blod i mig kogte." Fyri føroyingar var hetta uppaftur verri at síggja, tí teir staðfestu, at fiskurin „var fangen paa deres Meed." Allir sótu eftir við eini keðiligari kenslu, tí „vi følte alle, at vi skammeligen forsømme den Velstands og Rigdoms Kilde, som Forsynet har givet os, men vi føle ogsaa, at en Forbedring er umulig, saalænge Monopolets Strænghed vedvarer." (Pløyen 1966: 26) Tað var púra greitt, at Einahandilin forðaði fyri, at føroyingar fingu tað gagn burtur úr náttúrutilfeinginum, sum teir kundu fingið, um samfelagið var skipað á einum kapitalistiskum grundarlagi.

### 9.3.2 Havútróður við línu

Av størri týdningi enn sluppirnar var útróðurin ella haaf-fishing við seksmannaførum. Tað var línufiskiskapur, sum var rikin frá miðjum maimánað til 12. august. Henda fiskivinna var tætt knýtt at landbúnaðinum og lá ímillum váringina

og heystingina, og hon hevði gamlar røtur í samfelagsbygnaðinum (Pløyen 1966: 26). Í Hetlandi vóru nógvir smáir bøndur, sum høvdu jørð í leigu frá aðalsmonnum. Tað var fyri at gjalda leiguna, teir fiskaðu. Aðalsmenninir áttu bátarnar og reiðskapin, og tætt tilknýti til teir gjørdi, at smáu bøndurnir noyddust at fiska fyri teir. Hetta var ein skipan, sum helt vanligu almúguni niðri, soleiðis at hon var væl verri fyri, enn ein miðal føroyingur (Pløyen 1966: 31). Soleiðis lýsti Pløyen ta sonevndu Zetland Method, sum greitt er frá í kapitli 6.1. Pløyen ásannaði kortini, at harramenninir gjørdust høvuðríkir av hesum fiskiskapi, og tí helt Pløyen, at sjálvur fiskihátturin var verdur at royna í Føroyum.

Bátarnir fiskaðu við línum, sum vóru 42 favnar langar og høvdu 10 húkar. Til ein bát hoyrdu 120 línur, so hvør bátur setti 1200 húkar í ein 5040 favnar langan tein. Tá var lætt at síggja, hvussu nógv betri hesin mátin var, enn at ein bátsmanning fiskaði við 5 húkum (Pløyen 1966: 32).

Hetlendingar hongdu eisini agnið øðrvísi á húkin, og húkarnir vóru fýra ferðir so smáir sum teir vanligu í Føroyum. Teir fóru langt til havs at seta línuna og vóru burtur í 24 tímar, men teir fingu eisini nógv, „og det kunde vore Baade ogsaa gjøre, dersom vore Fiskere brugte Langliner, dersom deres Kroge ikke vare saa urimeligt store, at kun de største Fisk kunne gabe over dem.“ Tá ið bátarnir komu innaftur, avreiddu teir fiskin beinanvegin og fingu sama prís, sum føroyingar fingu fyri turran fisk. Munurin var, at hetlendingurin var leysur av fiskinum beinanvegin (Pløyen 1966: 33).

Pløyen samanbar haaf-fishing við útróður í Føroyum. Føroyingar áttu at havt fyrimun av, at fjøllini vóru nærum tvær ferðir so høg, tí so høvdu teir landkenning væl longri út til havs, enn hetlendingar høvdu. Eins og í Føroyum var tað ymiskt, hvussu langt var á fiskileið hjá hetlendingum. Búðu teir mitt í landinum, var langt at fara, meðan aðrir búðu beint við góðu miðini. Hetlendingar høvdu bygt sær býli á teimum støðunum, sum lógu best fyri, og so búðu teir har ta tíðina, sum fiskað varð. Eitt dømi var ein vík á eystursíðuni á hálvoynni Feideland. Higar komu útróðrarmenn úr øllum landinum í maimánaði. Teir bygdu sær smáttur úr gróti, tettu við mosa og taktu við flagi ella hálmi. Harramenninir, sum teir fiskaðu fyri, syrgdu fyri at hýsa fiskavirkara og hava krambúð opna. Til tíðir kundu 60 bátar við 6 monnum á hvørjum vera í havnini, so tá faktorar og aðrir vóru taldir við, og sluppir sigldu til og frá við farmi, ýddi av lívi í hesum lítla býnum, sum 12. august aftur varð oyðin (Pløyen 1966: 34). Tá ið Pløyen kom aftur av ferðini til Skotlands, vóru føroyingarnir komnir aftur av Burra, og Pløyen sendi teir til Feideland, so teir kundu læra enn meir á hesi útróðrarmiðstøðini (Pløyen 1966: 113).

Pløyen helt, at hetta var ein skipan, sum føroyingar áttu at tikið til sín (Pløyen 1966: 33). Sjálvur sá hann fyri sær, at Oyndarfjørður og Hvannasund høvdu egnað seg væl til slíkar útróðrarstøðir. Har vóru góðar havnir hjá smáum skipum, og tí var brúk fyri, tí útróðrarmenninir máttu sleppa av við ráfiskin og sleppa at keypa alla útgerð og proviant á staðnum. Aftur her slepti hann skjótt



*Pól á Látrinum, Pól í Búð og Mouritz Mohr fingu boð um at fara til útróðrarstøðina Feideland at læra enn meira, tá ið Pløyen kom aftur av ferð síni í Skotlandi. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

tankunum, tí hetta vóru treytir, „som neppe ville kunne bringes i Udøvelse, førend Enehandelen betydeligt indskrænkes." Nógv størri frælsi kravdist, og m.a. skuldi latast upp fyri fremmandum, donskum ella øðrum, um nøkur vón skuldi vera um framgongd, tí „det er ikke tænkeligt, at monopoliserede Fiskere paa eengang kunne blive Fiskeberedere, Kjøbmænd og Sømænd, alle disse Forbedringer maae komme efterhaanden."(Pløyen 1966: 35).

### 9.3.3 Møguleikar fyri fiskasølu í Spania

Marknaðarviðurskiftini vóru ikki tey somu í Hetlandi sum í Føroyum. Hetlendingar fingu 2 pund fyri tonsið av longu, ella millum 18 og 20 ríkisdálar meira enn føroyingar. Sum var, kundi tað als ikki loysa seg at turka longu í Føroyum, tí betri prísur fekst fyri tosk. Hetta komst av, at føroysk vøra varð seld á ávísum marknaði. Í Onglandi og Írlandi høvdu hetlendingar góðan marknað, men avgjøld og tollur vóru so høg, at hesir marknaðir ikki vóru møguligir hjá føroyingum at koma á.

Hinvegin vóru spaniumenn sjálvir byrjaðir at koma til Hetlands at keypa fisk. Hetlendingar kundu ikki sjálvir fara við fiskinum, tí so komu avgjøld uppá. Tað átti ikki at verið nógv torførari hjá spaniumonnum at komið til Føroya at keypt, og tí var tað ein møguleiki, tá nøkur vøra fór at vera at selja. Í fyrstuni kundi føroyskur fiskur verið seldur nakað bíligari, og so at siga ongi avgjøld vóru í Føroyum, so tað burdi borið til. Allir marknaðir høvdu í hvussu er tikið betur ímóti føroyingum, enn Kongligi handilin gjørdi, men Pløyen vildi ikki



*Útróðrarmenn á oynni Sandlodge. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

fara longur inn á hann, „men jeg kan forsikkre, at en Afhandling derom vilde være ganske morsom at læse."(Pløyen 1966: 41).

Móti endanum á ferðini fekk Pløyen møguleika at vitja lítlu oynna Vaila. Hesa oynna vildi hann vitja, tí har hevði Arthur Anderson eina stóra fiskivinnufyritøku, og hann virkaði klippfiskin øðrvísi enn hinir, tí hann brúkti sonevnda Yorkshire háttin, har fiskurin fyrst varð turkaður á pallum, ið vóru umleið 2 alin upp frá jørðini. Sjálvt um Anderson greiddi frá fyrimununum við sínum hátti, so dugdi Pløyen ikki at síggja, at hesin fiskurin var betri enn tann, sum var turkaður á helluni. Tí var eingin orsøk til at brúka pening upp á slíkar pallar. Marknaðurin hjá Anderson var Spania, og hann brúkti minni salt enn aðrir hetlendingar (Pløyen 1966: 143–144). Her er vert at viðmerkja, at tað var hesin Arthur Anderson, sum gjørdi mest við at menna spanska marknaðin (Goodlad 2014: 94). Seinni gjørdist hann formaður í stóra skipafelagnum P&O og parlamentslimur umboðandi Hetland og Orknoyggjar.

## *9.4 Hay & Ogilvy til Føroya*

Tá ið Pløyen kom aftur til Føroya, skrivaði hann eina frágreiðing um ferð sína til Rentukamarið. Í frágreiðingini helt hann, at tað átti at borið til at lyft føroysku vinnuna upp á sama stig sum ta hetlendsku. Pløyen var týðiliga bergtikin av hesum møguleikunum og segði við Rentukamarið:

> alt Fiskeriet paa Shetl. foregaar med Langliner, her med Haandliner, og at Fordelen af Langlinerne maa være indlysende, naar man betænker, at 6 Mand paa en Baad, som fisker med Haandliner, kun ere istand til at udhænge 5 Kroge, i det den 6te Mand holder Baaden i bevægelse, hvorimod 6 Mand, som fiske med Langliner, udsætte 1200 Kroge. Resultaterne af denne forskellige Fangemaade ere i Sandhed mærkelige; jeg har i Shetland seet Masser af Fisk bragte i land, som jeg aldrig havde kunnet tænke mig mulige, jeg har seet en Velstand, et Liv

og en Bevægelse, som dobbelt har ladet mig føle den Mangel paa Virksomhed i Fiskerierne, som desværre hersker her.

Hetlendski fiskimaðurin seldi fiskin avhøvdaðan, men við ryggi, so skjótt sum hann kom til lands. Keypmaðurin rindaði fyri ráa fiskin, sum hann læt virka víðari. Fiskimaðurin fekk umleið sama prís fyri pundið av ráfiski, sum føroyingar fingu fyri pundið av turrum fiski í Einahandlinum. Undir slíkum handilsviðurskiftum var einki at siga til, at føroyingar ikki vildu seta lív og ognir í veð fyri at bøta um fiskivinnuna. Fyrst í øldini var fiskivinnan í Hetlandi á sama stigi sum í Føroyum, og munurin var íkomin, tí at hetlendingar fóru at virka klippfisk, meðan føroyingar hildu fram at virka stokkfisk[120].

Pløyen vísti í frágreiðing síni á, at einstakir vinnulívsmenn høvdu sett nógvan pening í vinnuna, t.d. Hay & Ogilvy í Lerwick, og teir høvdu ment vinnuna til tað høga stigið, sum hon var komin á. Hesir menn høvdu nú royndir í vinnuna, og tað var avgerandi fyri góðu gongdina „og jeg maatte naturligviis ansee det for den bedste og hurtigste Maade, til at hæve det færøiske Fiskeri fra dens nuværende Intet til en pludselig Opblomstren, dersom saadanne Mænd vilde grunde et Fiske-Etablissement her paa Færøerne.“

Pløyen var á ferðini vorðin uppaftur meira vísur í, at fiskivinnan var rætti vegurin at menna Føroyar, og hann vildi hava gongd í nýggju vinnuna skjótt. Besti mátin at gera tað var at lata hetlendingar sleppa at byggja eina fiskivinnu upp, og longu áðrenn hann fór úr Hetlandi, skrivaði hann til Hay & Ogilvy og spurdi, um og undir hvørjum treytum, teir vildu stovna eina fiskivinnufyritøku í Føroyum, um so var, at stjórnin loyvdi tí[121].

Hay & Ogilvy svaraðu seks dagar seinni, 5. september. Teir svaraðu, at treytin var, at teir fingu loyvi til at keypa fisk frá føroyingum og at selja teimum ta útgerðina, sum brúk var fyri til fiskingina, uttan at teir fingu kapping frá øðrum enn Kongliga handlinum. Fingu teir hetta loyvið, vóru teir til reiðar at stovna eina fyritøku beinanvegin á tí staðnum, sum teir hildu vera best egnað, eftir at teir høvdu havt møguleikan at vitja oyggjarnar. Um hesar treytir komu upp á pláss, áðrenn várið kom, kundi teir tryggja, at nakað av virksemi bleiv longu komandi ár.

Teir vildu ikki fara inn í smálutir um, hvat slag av virksemi, talan for at verða um, men Pløyen hevði sæð ymsar partar av fyritøkuni, og virksemið í Føroyum fór at minna um tað í Scalloway Hillswick, og tað átti at givið honum eina mynd av, hvat fór at henda í Føroyum. Eydnaðust hesar fyrstu royndirnar, fóru fleiri slíkar støðir at koma í Føroyum. Teir høvdu ongar ætlanir um at senda hetlendingar til Føroya, men ætlaðu heldur at læra føroyingar, „as we believe that is indeed

120 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 214. Bræv til Rentukamarið við frágreiðing frá Hetlandsferðini dagfest 14. september 1839.

121 Ibid.

obvious, that no real benefit can arise ... by the introduction of any new system unless that system embraces the full employment of the inhabitants."

Ein slík fyritøka var váðafull og kravdi stóran part av kapitalinum hjá Hay & Ogilvy, og tí var eitt krav, at privilegiini vóru galdandi í eini 15 til 20 ár. Um tað ikki kundi fáast, so kundu teir ikki veita vissu fyri, at føroyska fólkið fór at fáa allan tann ágóðan, sum teir vónaðu, at teir fóru at kunna geva tí. Teir lótu alt upp í hendurnar á Pløyen, men løgdu at enda afturat, at sjálvt um einki kom burtur úr hesum, so vóru teir meir enn fegnir at geva føroyingum alla ta vitan, sum teir høvdu um fiskarí ella aðra vinnu, so tað var bara at spyrja um tað[122].

Pløyen sendi avrit av svarinum frá Hay & Ogilvy við frágreiðing síni, og saman við brævinum frá 26. februar helt Pløyen ikki, at neyðugt var at gera meira við henda spurningin nú. Hesir menn vóru førir fyri at seta gongd á skjótt, og Pløyen vónaði at teir fingu loyvi, tí hetlendingar høvdu nógv meira viðkomandi royndir enn danskir reiðarar høvdu[123].

Hesa síðstu viðmerkingina útgreinaði Pløyen nærri í bók síni, har hann greiddi frá, at hann var ikki vísur í, at danskir keypmenn vóru teir røttu at seta gongd í føroyska fiskivinnu, tí í Danmark var ikki so nógv fiskivinna og fiskahandil, og tí fóru danskir vinnulívsmenn at mangla ta vitanina, sum kravdist, um slíkt virksemi skuldi eydnast. Her viðmerkti hann kortini, at tað vóru 10 ár liðin, síðan hann fór úr landinum, so hugurin hjá keypmansstættini til at gera íløgur í nýggjar ídnaðarætlanir kundi vera broyttur hesi árini. Hann vónaði, at støðan var broytt, tí „det skulde være mig inderligen kjært, dersom min Anskuelse var urigtig. Indtil jeg bliver overbevist om det Modsatte, anseer jeg den imidlertid for rigtig, og gaar ud fra den som saadan"(Pløyen 1966: 36).

At loyva hetlendskum keypmonnum at reka fiskivinnu í Føroyum, kundi ikki skaða donsk áhugamál, „som tvertimod vilde profitere af den Fremmedes Erfaring i et Fag, der er dem temmelig nyt." Føroyingar fóru ikki at verða bundir av fremmandum keypmonnum í sínum egna landi. Tvørturímóti vóru bæði fremmandir og danskir keypmenn bundnir av føroyingum, tí eingin annar var at gera arbeiðið fyri teir. Fingu føroyingar ikki rímiliga løn, kundu teir liva sum higartil, og tað átti at verið „betryggende mod enhver Frygt, som muligen kunde næres for at Shetlænderne nedsætte sig her i Landet."(Pløyen 1966: 36).

Einki sæst til, at Pløyen fekk nakað beinleiðis svar upp á ynski sítt um at lata eina hetlendska fyritøku leggja lunnar undir eina føroyska fiskivinnu, men í allari víðari viðgerðini av spurningunum um føroyska fiskivinnu og um fríhandil í Føroyum er greitt, at tað taldi nógv, at tað fyrst og fremst skuldi vera talan um danskar ríkisborgarar, sum tóku lut í nýggju møguleikunum. Hesa støðu hevur Pløyen helst fingið kunning um, meðan hann var í Danmark í sambandi við tað

122 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra L, bræv nr. 877. Bræv frá Hay & Ogilvy til Pløyen amtmann dagfest í Lerwich 5. september 1839.

123 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 214. Bræv til Rentukamarið við frágreiðing frá Hetlandsferðini dagfest 14. september 1839.



*Charles Ogilvy tók væl ímóti Pløyen og hansara monnum, tá ið teir komu til Lerwich. Ogilvy hevði stóran áhuga fyri Føroyum og var til reiðar at seta gongd á eina rættiliga fiskivinnu her í 1839. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

nevndararbeiðið, sum greitt verður frá í komandi kapitli. Undir øllum umstøðum tykist tað vera greitt, at upplagda loysnin at flyta hetlendska fiskivinnu til Føroya ikki var møgulig orsakað av tjóðskaparligum atlitum.

Tað ber sjálvandi til at gera sær hugsanir um, hvat hevði hent, um Hay & Ogilvy fingu møguleikan at menna fiskivinnuna í Føroyum longu í 1840, men longu meðan Pløyen vitjaði fyritøkuna, var hon farin at merkja, at tíðirnar broyttust, serliga í sildaveiðuni. Í frágreiðingini til Rentukamarið segði Pløyen, at sildaveiðan hevði verið stór síðstu 10 árini, men hon miseydnaðist í 1839, so hann kundi ikki siga so nógv um hana[124]. Pløyen visti helst ikki, tá ið hann var í Hetlandi, at roknskapurin hjá fyritøkuni longu í 1837 vísti, at hon var farin á húsagang (Smith 1986: 302)

Hay & Ogilvy høvdu sett nógvan pening í sildaveiðuna, og tá hon aftur miseydnaðist í 1840, samstundis sum fyritøkan misti fleiri sildabátar í einum stormi í september tað árið, kom fyritøkan í trupulleikar. Teir royndu at hóra undan eina tíð, men í mai 1842 var einki at gera. Hay & Ogilvy fór á húsagang, og saman við fyritøkuni fór Shetland Bank, og tað hevði alt við sær, at hetlendski búskapurin lá í sori í fleiri ár. „A promising era in Shetland's economic history came to a premature end.“ (Nicolson 1982: 7).

124 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 214. Bræv til Rentukamarið við frágreiðing frá Hetlandsferðini dagfest 14. september 1839.

## *9.5 Bretskir handilsmenn óttaðust Einahandilin*

Sum sagt í byrjanini av hesum kapitlinum var fiskivinnukunning ikki upprunaliga endamálið við ferðini til Hetlands. Endamálið var upprunaliga at kanna, hvussu tað bar til, at 20.000 fólk búðu í Hetlandi, og bert ein góður fjórðingur av tí í Føroyum, tá ið umstøðurnar annars líktust so nógv. Í huganum hevði Pløyen helst fyrst og fremst ymiskar ábøtur á landbúnaðin, og tá ið ferðin endiliga gjørdist til veruleika, var ein av høvuðsuppgávum hansara at fáa til vega eina last av seteplum, tí setin í Føroyum var vorðin vánalig, og tað var umráðandi at fáa nýggja set, um eplaveltingin, sum hevði so stóran týdning fyri framburðin í landinum, ikki skuldi detta niðurfyri aftur. Harumframt hevði hann frætt um eina torvpressu í Skotlandi, sum hevði kunnað lætt nógv um strævna og arbeiðskrevjandi torvarbeiðið og harvið leysgivið arbeiðsmegi til aðrar uppgávur.

Í grein í Fróðskaparritum (Isholm 2014) havi eg greitt frá, hvussu hesin parturin av hetlandsferðini hjá Pløyen gekst. Har er eisini lýst, hvussu torført tað var hjá Pløyen at fáa bretskar handilsmenn at taka seg í álvara, tá ið hann greiddi frá, at einahandil framvegis var í Føroyum. Einahandilin bannaði øðrum at flyta út føroyskar vørur, so um eitt skip skuldi koma við seteplum til Føroya, so fekk tað ongan farm heim við aftur, og tí kundi tað bara gerast fyri ein dýran fraktkostnað. Harumframt var øll tankagongdin við einum kongligum einahandli púra fremmand fyri bretsku handilsmenninar, og teir tóku javnan synd í føroyingum, tí at teir undir einari slíkari skipan ikki fingu høvi at brúka og menna sínar kreftir. Tað var helst høvuðsorsøkin til, at Pløyen fór úr Skotlandi aftur uttan at hava fingið nakað burtur úr ørindum sínum. Hann ásannaði, at Einahandilin var ein meinbogi, og í øllum førum gjørdi hann tað vónleyst at fáa bretskar handilsmenn áhugaðar í at koma til Føroya við vøru. Lítil ivi er í, at tað, at bretskir handilsmenn ikki vildu taka Pløyen í álvara, tá ið hann greiddi frá, at hann kom úr landi við einahandli, ávirkaði hugsan Pløyens um Einahandilin í Føroyum.

## *9.6 Samandráttur*

Upprunaliga var fiskivinna ikki partur av endamálinum at gera eina kanningarferð til Hetlands, og tí var fiskivinna als ikki nevnd í fyrstu umsóknini frá 1836. Tá ið ferðin endiliga kundi gerast til veruleika í 1839, var Pløyen vorðin amtmaður, og hesi árini høvdu lært hann, at framtíð Føroya ikki einans lá í at menna landbúnaðin. Tí kom fiskivinna at gerast ein týdningarmikil partur av kanningunum í Hetlandi, og teir tríggir føroyingarnir, sum við vóru, skuldu bara fáast við henda partin.

Í Hetlandi sá Pløyen við egnum eygum, hvussu nógv ríkari eitt samfelag kundi gerast, har fiskivinnan var ment, og lætt var hjá honum at ímynda sær, at tað sama fór at henda í Føroyum, um uppskot hansara frá 26. februar 1839 og



*Pløyen fór við dampskipinum "Sovereign" úr Hetlandi til Skotlands. Tað var fyrsta dampskipið, sum sigldi upp á Hetland, og tað byrjaði at sigla í 1836. Henda fergusiglingin gjørdi eisini, at umheimurin kom nærri Føroyum, tí nú fekst samband við allan heim gjøgnum Hetland. (Mynd: Shetland Museum and Archives)*

lærdómurin úr Hetlandi varð framdur í verki í Føroyum. Eitt av týdningarmiklastu úrslitunum av ferðini var tí, at tað gjørdist uppaftur greiðari, hvussu átroðkandi tað var at fáa ment eina fiskivinnu í Føroyum.

Á sínari ferð í Skotlandi at finna onkran at senda setepli til Føroya, rendi hann seg fleiri ferðir í handilsmenn, sum als einki skiltu av, at einahandil framvegis var galdandi í Føroyum. Pløyen noyddist at ásanna, at tað fór at verða torført hjá føroyingum at handla við útheimin, so leingi sum einahandilsskipanin var í gildi. Eins og Stættatingið hevði gjørt árið fyri, vístu bretsku handilmenninir, at frælsi heimurin ikki vildi hava nakað við nakra einahandilsskipan at gera, og so hvørt sum frælsi fekk størri og størri pláss í grannalondunum, gjørdist handilsskipanin í Føroyum meira og meira ótíðarhóskandi.

Pløyen vildi fegin hava hetlendingar at hjálpa til at byggja upp eina fiskivinnu í Føroyum, tí teir høvdu viðkomandi royndirnar, men tað var at fara eitt stig ov langt, tí í Keypmannahavn var eingin ivi um, at tað bara vóru danskir ríkisborgarar, sum skuldu gagnnýta møguleikarnar, sum lógu í fríum handli og fiskivinnu í Føroyum. Tað hevði við øðrum orðum framvegis størri týdning at verja tjóðskaparlig áhugamál enn at brúka allar møguleikar at menna eina fiskivinnu og harvið alt tað føroyska samfelagið. Ein slík menning skuldi gerast innan fyri ríkismørkini.

# 10. kapittul
# *Ónøgdin við Einahandilin økist*

Tá ið Pløyen kom aftur av hetlandsferð síni í 1839, merktist stór misnøgd við Einahandilin og serliga við nýggju úthandlarnar. Sjálvur fór Pløyen saman við Hunderup sorinskrivara til Klaksvíkar at kanna málið í november, og í somu løtu, sum hann steig á land, „blev jeg omringet af Almuen, som høit og bitterligen beklagede sig over, at den ikke kunne levere sin Tran af Mangel paa Tøndegods, at ikkun en Baad kunne blive expederet om Dagen af Mangel paa de fornødne Hjælpere, at entligen, ikkun daarligt Korn blev udsolgt, skjønt der paa Lofterne fandtes tilstrækkelig Beholdning af godt Korn."

Handilin var komin undir stórt trýst, og serliga stór var misnøgdin við teir nýggju úthandlarnar, sum annars vóru tann stóra nýskapanin í lógini frá 1836, og sum høvdu til endamáls at gera Einahandilin smidligari hjá føroyingum. Nógvar hugsanir vóru frammi um, hvat var galið við Einahandlinum. Amtmaðurin fekk hópin av klagum, og tað vóru serliga hann og hægsti kirkjuligi myndugleikin, prósturin á Nesi, sum komu at seta orð á ónøgdina.

## *10.1 Kongskvøða við nýggjum ynskjum*

Amtmaðurin fekk steðgað ringastu misnøgdini í Klaksvík á heysti 1839, men misnøgdin var sum heild stór við Einahandilin, og Pløyen hoyrdi klagur um handilin alla staðni, har hann kom, og í Havn komu fólk javnan til hansara við klagum. Henda misnøgdin var ein gyltur møguleiki hjá teimum, sum vildu hava broytingar at henda við handlinum, og í september 1839 visti Schrøter at siga, at føroyingar kanska fóru at geva amtmanninum eina adressu við umbøn um fríhandil, sum hann so skuldi geva kongi. Amtmaðurin hevði sagt, at hann vildi fara við adressuni, um Schrøter kundi fáa nóg nógvar menn at skriva undir (Nolsøe og Jespersen 2009: 302).

Høvið til at skriva eina slíka adressu kom 3. desember 1839, tá ið Fríðrikur 6. kongur doyði. Í Danmark tóku frísinnaðir danir seg saman at lata nýggja konginum eina adressu við umbøn um eina nýggja fólkaræðisliga stýrisskipan, men Kristian 8. vildi ikki sleppa einaveldinum (Karpantschof og Mikkelsen 2013: 67). Til sama høvið snikkaðu J.H. Schrøter og Pløyen saman eina adressu, sum Pløyen síðani sendi til sýslumenninar, so teir kundu fara runt í sínum sýslum at fáa adressuna undirskrivaða.

Umframt at heilsa nýggja konginum og sýna honum samkenslu vísti adressan á, at føroyingar framvegis livdu undir bandi Einahandilsins, og tað forðaði fyri



*Fríðrikur 6. doyði 3. desember 1839, og tað gav høvi til at senda nýggja konginum Kristiani 8. eina heilsan. Á myndini liggur Fríðrikur lit de parade í Amalienborg. (Mynd: wikicommons)*

menning av vinnumøguleikum. Tað var kortini ikki kongsins skyld, tí „den Høisalige ved flere Leiligheder paa det høitideligste har udtalt, som Sin bestemte Villie, at vi, saasnart Omstændighederne og Forholdene gjorde det tilraadeligt, skulde deelagtiggjøres i den samme Frihed.“ Umframt frían handil varð í adressuni sett fram ynski um, at føroyingar fingu sítt egna fólkavalda umboð á Stættatingi.

942 fólk ella húsharrar skrivaðu undir adressuna, og tað var so at siga hvørt einasta hús í landinum. Kortini ber til at ivast í, um tað merkti, at full undirtøka var fyri hesum báðum ynskjunum, tí tað var helst ikki lætt hjá nøkrum at nokta fyri at skriva undir, tá ið sýslumaðurin kom á gátt við áheitan um at senda nýggja konginum eina heilsan og ynskja honum alt tað besta. Serliga ynskið um fríhandil ørkymlaði, og tað kom m.a. fram í brævinum, sum sýslumaðurin í Eysturoynni sendi amtmanninum, tá ið hann sendi undirskrivaðu adressuna aftur. Hann greiddi frá, at tey flestu høvdu undirskrivað, „dog mange med Betænkelighed for saavidt Frihandels Ønsket angaar.“ Sýslumaðurin vónaði, at hann hevði gjørt sína plikt,

> men at Tænke overensstemmende med Handlingen kan jeg ikke, og derfor maae jeg forbigaae selv at underskrive Adressen, thi saa gjerne som jeg ønskede at deeltage i at lykønske Hans Majestet saameget skielver min Haand tilbage for at underskrive Ønsket om Frihandel saalænge alle muelige Forsøg ikke ere Anvendte til at faae Kongshandelen dreven efter mildere Regler hvilket formodentligen kunde og burde være muligt, og som naar alle Omstændigheder sammentages vistnok var det mest passende, gode og gavnlige og en modsat Fremgang drager



*942 húsharrar skrivaðu undir heilsanina, sum eisini var ein áheitan um at avtaka Einahandilin og at fáa eitt fólkavalt umboð á stættating. (Mynd: Rolf Guttesen)*

> i mine Tanker et vanærende Slør over de tidligere Embedsmænd og fornuftige af Indbyggerne som saa ofte have talt og skrevet imod Handelens Frigivelse.

Viðvíkjandi sjálvstøðugari umboðan á stættatingi helt sýslumaðurin, at ein slík umboðan fór at kosta føroyingum meira, enn hon fór at geva av fyrimunum, og hann ivaðist ikki í, at føroyingar vóru samdir við honum í tí, tá ið teir sóu roknistykkið[125].

Henda viðmerkingin hjá Eysturoyar sýslumanni gevur eina ábending um, at tað í stóran mun var trúskapur móti myndugleikunum, sum fekk fólk at skriva undir ynskið um fríhandil. Tað er ikki sørt áhugavert, tí tað gevur eina mynd av, at trúskapurin móti amtmanninum og hansara monnum fekk føroyingar at skriva undir eitt ynski til kong um at avtaka kongsins handil í Føroyum, og at kongur skuldi lata fólkið velja føroyska umboðsmannin á Stættatingi, heldur enn at hann sjálvur gjørdi tað. Við øðrum orðum var henda fólksliga kveikingin stýrd úr erva av embætismonnum.

Tí vóru eisini fleiri sjónarmið um, hvussu nógv trúvirði var í adressuni, og ikki minst í hvussu stóran mun hon kundi tulkast sum, at føroyingar nú vóru fyri fríhandli. Lunddahl fúti segði, at hon „tydelig har vist, deels at Færingernes Stemning ikke er for det stedfindende Monopol, deels at de ingenlunde nære

125 Kopibók hjá Eysturoyar sýslumanni. Bræv til amtmannin dagfest 25. apríl 1840.

Frygt for en velbetænkt Indførelse af Handelsfrihed." Fyrr høvdu føroyingar verið ímóti fríhandli, men orsøkin var ringu royndirnar frá tíðini, áðrenn kongur yvirtók handilin í 1709. Nú var støðan broytt, og serliga høgi prísurin á teimum týdningarmiklu vørunum byggi og tubbaki hevði gjørt sítt til at fáa fólk at broyta hugsan. Tí vóru fólk ikki longur ímóti tí, sum sett varð sum mál í handilsskipanini frá 1790[126].

Henda síðsta grundgevingin hjá fútanum samsvarar í ein ávísan mun við tulkingina hjá Jákupi Nolsøe handilsforvaltara, sum helt, at adressan bara snúði seg um at siga kongi, at yvirlýsingin frá desember 1834 um 33 1/3 % av vinningi á neyðsynjarvørum var ósømilig (Nolsøe og Jespersen 2009: 303). Í aðrar mátar helt handilsforvaltarin ikki, at adressan á nakran hátt merkti, at føroyingar ynsktu at fáa fríhandil (Nolsøe 1841: 7).

Óvissan um, hvat tað var, fólk høvdu skrivað undir, hevði við sær, at ein onnur adressa fór at ganga runt árið eftir, har fólk savnaðu inn undirskiftir at mótmæla adressuni frá 1840. Tá vóru tað fleiri, sum høvdu skrivað undir fyrru adressuna, sum eisini skrivaðu undir hesa seinnu (Nolsøe 1984: 251). Tað var sostatt eitt sindur ógreitt, hvussu undirtøkan fyri adressuni skuldi tulkast, og tann óvissan gav helst handilsmyndugleikunum møguleikan at taka minni atlit til adressuna.

Torført er at finna stórvegis tilfar um hesa seinnu adressuna, og lítið sæst aftur til, at føroyingar hava roynt at greitt gjølligari frá sínum sjónarmiðum um handilin, men í donskum bløðum undraðust 18 nólsoyingar á seinnu adressuna í oktober 1841. Nólsoyingarnar skrivaðu, at teir tíverri høvdu frætt, at nógvir føroyingar høvdu undirskrivað eina áheitan, sum gekk um landið, um at varðveita Einahandilin. Tað høvdu teir gjørt, sjálvt um teir árið fyri høvdu undirskrivað adressuna, har biðið varð um frían handil. Tí vildu nólsoyingarnir boða frá, at ongar smærri broytingar í einahandilsskipanini fóru at broyta teirra hugsan um, at fríhandil var tað rætta. Teir undraðust eisini á, at Nolsøe handilsforvaltari og Schrøter prestur høvdu sett seg á odda fyri tann flokkin, sum vildi varðveita handilin. Teir kendu allir handilsforvaltaran frá sínum ungu døgum, og tað var serliga hann, sum „har grundlagt og indprentet os den Friheds-Aand, vi ere stolte af, fremfor mange af vore øvrige Landsmænd at besidde". Teir viðgingu, at teir ikki vistu, um Einahandilin kundi broytast, soleiðis at hann gjørdi sítt til at fyrireika føroyingar til fríhandil, men teir vistu, at teir vóru sera misnøgdir við núverandi handilsstjórn[127].

## *10.2 Hvassar atfinningar um handilsforvaltaran*

Hugsjónarliga var Einahandilin ein forðing fyri menningini av einum frælsum vinnulívi, og tað er eitt sjónarmið, sum fleiri ferðir er komið til sjóndar í tí,

126 J.A. Lunddahl í grein í dagblaðnum „Dagen" nr. 231 frá 5. oktober 1840.
127 Kjøbenhavnsposten nr. 285 frá 17. oktober 1841.

sum embætismenn skrivaðu um Einahandilin. Fyri fólk flest tykist tað kortini ikki, sum at hesin hugsjónarligi meinbogin hevur havt stóra rúmd, tí ónøgdin við Einahandilin stavaði frá ítøkiligum vansum, sum fólk upplivdu í sínum gerandisdegi. Tí varð stórur partur av teirri misnøgdini, sum átti at verið vend ímóti einari avoldaðari skipan, vend ímóti handilsforvaltaranum og hansara umsiting av handlinum. Í hesum partinum verður hugt at, hvat misnøgdin við handilsforvaltaran snúði seg um, og tað verður serliga gjørt ígjøgnum eitt skriv, sum Pløyen amtmaður sendi Rentukamarinum, og ein bókling, sum Garde próstur skrivaði í 1841.

### 10.2.1 Pløyen amtmaður klagar um handilsforvaltaran

Allar tær klagurnar, Pløyen fekk frá fólki um Einahandilin, gjørdu, at hann í longum skrivi til Rentukamarið gramdi seg um støðuna og kravdi, at Rentukamarið tók greiða støðu í nøkrum málum millum seg og Nolsøe handilsforvaltara.

Pløyen vísti á, at upprunaliga vóru fólk spent uppá at fáa úthandlar, men líka síðani teir vóru komnir, hevði Pløyen áhaldandi hoyrt, at teir vóru so illa forsýnaðir, at tað var sjáldsamt at fáa tað, sum fólk ynsktu sær, tá ið tey fóru í handilin. Tí noyddust tey at fara minst tvær ferðir til handils heldur enn at gera ein túr til Havnar og fáa alt har. Harumframt gekk avgreiðslan „overordentligt langsomt“, tí har vóru bara 2 mans í hvørjum handlinum, og teir tóku ikki hjálparfólk inn, tá ið tørvur var á tí. Harumframt hildu fólk, at úthandlarnir fingu vánaligastu vøruna, meðan betra vøran var eftir í Havn.

Sjálvur trúði Pløyen ikki hesum síðsta, og hann hevði fleiri ferðir roynt at greitt fólki frá tí, men misnøgdin og mistankin var grógvin so fastur, at tað fór at taka bæði tíð og orku at fáa hann burtur aftur. Pløyen helt, at orsøkin til hesa misnøgd var, at landið summarið fyri fekk eina last av vánaligum korni. Meginparturin varð sendur aftur til Danmarkar, men áðrenn tað hendi, hevði forvaltarin longu blandað ein part av korninum við tað gamla og góða kornið, sum handilin hevði, og tað varð selt bæði í Havn og í úthandlunum. Tá ið tað síðani frættist, at gott korn nú fekst í Havn, meðan úthandlarnir framvegis seldu tað vánaliga, hildu tey seg vera verri viðfarnan enn havnarfólk, og síðani kom henda hugsan at fevna um allar hinar vørurnar í handlunum.

Sostatt hevði handilsforvaltarin ikki alla ábyrgdina av hesum, men hann hevði gjørt nakað ólógligt við at blanda saman gott og vánaligt korn, so at hann kundi sleppa av við tað vánaliga kornið. Hetta við at blanda vørur saman, hevði handilsforvaltarin leingi gjørt, og eitt dømi var um, at hann blandaði grønar og gular ertrar saman, tí eingin vildi keypa tær grønu.

Pløyen gramdi seg um, at handilsforvaltarin gekk beinleiðis ímóti sínum boðum í fleiri førum. M.a. hevði Pløyen fingið fleiri klagur um, at avgreiðslan í handlinum í Klaksvík gekk ov seint, og hann skilti, at faktor Mortensen var hildin uppat at brúka hjálparfólk, stutt eftir at Pløyen hevði givið honum boð um at gera tað. Sjálvur visti Pløyen ikki, um tað var ein avgerð, sum faktorurin



*Trupulleikarnir av at sleppa av við grindalýsi við úthandilin í Klaksvík elvdu til stóra misnøgd við Einahandilin. (Mynd: Tjóðsavnið 5101F042)*

sjálvur hevði tikið, ella um boð vóru komin frá handilsforvaltaranum. Hann hevði kortini hug at umbera faktorin, tí allir, sum arbeiddu við handilin, vóru undirlagdir handilsforvaltaran. Teir tordu illa at gera nakað sjálvir, tí forvaltarin hevði stutt frammanundan sagt upp annan mannin í handlinum í Klaksvík, Dánjal Jacob Joensen, uttan at tað var gjørt eftir lóg ella dómi, og uttan at geva nakra grundgeving fyri tí.

Pløyen hevði skrivað til handilsforvaltaran fleiri ferðir og eisini sent honum spurningar í sambandi við tær skrivligu klagurnar, sum inn vóru komnar, men einki svar kom frá handilsforvaltaranum. Handilsforvaltarin hevði eisini fingið boð frá einum av bøkjarunum í Klaksvík um manglandi tunnurnar til at taka ímóti lýsi, men morgunin eftir fór hann til Vestmannar at lata handilin har upp uttan at gera nakað við støðuna í Klaksvík. Tað endaði tí við, at Pløyen sjálvur tók stig til, at nakrar tunnur vóru gjørdar og sendar norður. Kortini høvdu tunnur vantað allan veturin, og eitt dømi var um menn úr einari bygd, sum 6 ferðir róðu til Klaksvíkar við lýsi sínum, uttan at sleppa av við tað. Henda støðan var so ótolandi, at tað hevði verið líka við, at bardagi brast á millum kundarnar og menninar í handlinum.

Handilsbetjentarnir í úthandlunum høvdu munnliga gramt seg fyri Pløyen um, at teir skuldu svara fyri undirvekt av vørum, sum teir seldu, og yvirvekt av vørum, sum teir keyptu, til forvaltaran. Hetta bar ikki til, tí tað var til stórt tap fyri teir persónliga. Fyri at sleppa undan tapi løgdu teir uppfyri hjá viðskiftafólkunum, og tá merktist eisini misnøgd við tað millum fólk. Serliga frá nøkrum íbúgvum á

eystursíðuni á Eysturoy var misnøgd við hetta, og tí helt Pløyen, at úthandilsmenn áttu at fingið ein part av svinnprosentunum. Pløyen hevði hoyrt, at forvaltarin hevði havt ein vinning upp á 700 ríkisdálar av hesum svinnprosentum, sum hann helst fekk fyri at eggja til so lítið svinn, sum til bar, men tá einki av hesum varð lagt til úthandlarnar, fekk hann henda vinningin upp á bekostning av handilsfólkunum ella íbúgvunum har. Hetta gjørdi eisini, at faktorarnir við úthandlarnar vóru sera varligir í sínum vørubíleggingum, og tað var ein orsøkin til, at vøruúrvalið ikki var so stórt, sum tað átti at verið.

Sum embætismanni var eisini nógv at finnast at handilsforvaltaranum. Bæði almúgan og embætismenn klagaðu um, at forvaltarin ongantíð var á síni skrivstovu. Pløyen hevði heitt á hann at vera á kontórinum onkra fasta tíð, og hann lovaði at vera har hvønn fyrrapart millum klokkan 11 og 12, men hann helt als ikki lyftið. Hann var altíð í gongd við at laga ella kálka lagingar og tjøra bátar og hús, og soleiðis var hann ílatin sum ein av pøblinum og als ikki sum ein embætismaður. Tí bar bara til at fáa orð á hann, um man fór har, sum man visti, at hann arbeiddi. Ein bygdamaður hevði biðið Pløyen hjálpt sær at finna forvaltaran, tí hann hevði gingið ein heilan dag í Havn uttan at finna hann. Tað eggjaði aftur Pløyen til at seta forvaltaran upp á pláss. Hann spurdi og fekk svar, men líka lítið hjálpti, og eisini henda veturin hevði forvaltarin gingið úti og gjørt handverksarbeiði. Hvussu hetta nógva arbeiðið hjá forvaltaranum ávirkaði viðlíkahaldsútreiðslurnar hjá handlinum visti hann ikki, men higartil hevði tað so ikki eydnast at fáa hann at hava fasta forrætningstíð.

Tað var óbehagiligt at klaga soleiðis, og sum einstaklingur hevði hann ikki gjørt tað, men „min Virksomhed og Agtelse som Embedsmand maa nødvendigen indskrænkes og svækkes", tá ið hann ikki fekk svar upp á spurningar, sum hann helt seg hava rætt til at spyrja, og tá ið íbúgvar klagaðu bæði munnliga og skrivliga, og hvørki skrivlig ella munnlig lyfti vórðu hildin. Hann hevði víst almúguni, at hann gjørdi tað, sum hann kundi gera, og hann hevði eisini tikið avgerðir, tá ið hann var á staðnum, men tað var „krænkende for mig", at forvaltarin gekk ímóti hesum avgerðum, so skjótt sum hann kundi. Hann helt ikki, at tað var rætt, at hann skuldi hava eftirlit við forvaltaranum, tá ið tað gekk so illa at fáa síni sjónarmið ígjøgnum. Tí vildi hann hava at vita frá Rentukamarinum, um tað bara var eftirlitið hjá Handilsstjórnini, sum var avgerandi.

Hann bað Rentukamarið avgera: 1. At handilsforvaltarin fekk greið boð um at svara innanfyri eina rímiliga freist, tá ið Pløyen spurdi embætis vegna. Og hann skuldi eisini beinanvegin svara teimum skrivum, sum Pløyen sendi honum, eisini tá ið tað var víðarisending av klagum frá fólki. 2. Um amtmaðurin hevði rætt til at taka avgerðir viðvíkjandi handilsins umsiting, sum hann helt vera rættar í mun til „øjeblikkelig fornødenhed" og til fólksins tørv, og at forvaltarin í slíkum samanhangum fekk boð um at fylgja ordrum amtmansins. 3. Um at ein hóskandi



*Torført var at hitta handilsforvaltaran á skrivstovu hansara, tí hann gekk javnan úti og gjørdi ymiskt viðlíkahaldsarbeiði við bygningarnar hjá handlinum. (Mynd: Tjóðsavnið 5207F47.922)*

partur av svinnprosentunum varð lagdur til faktorarnar í úthandlunum. 4. Um at áleggja forvaltaranum at hava fasta skrivstovutíð[128].

Rentukamarið svaraði ikki hesum spurningunum frá Pløyen fyrr enn síðst í februar 1842[129], men tá var so nógv annað hent í handilsmálinum. Pløyen fekk 29. mai 1840 frá Rentukamarinum loyvi til at koma til Danmarkar hetta summarið[130], og 12. juni skrivaði hann til allar embætismenn í Føroyum, at hann

128 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 278. Bræv frá Pløyen amtmanni til Rentukamarið dagfest 2. apríl 1840.

129 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 1166. Bræv frá Rentukamarinum til Pløyen amtmann dagfest 26. februar 1842.

130 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 69. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannin dagfest 29. mai 1840.

ætlaði at nýta skipsmøguleikan, sum tá var, at fara á ta danmarkarferðina, sum hann hevði fingið loyvi til. Meðan hann var burtur, skuldi Lunddahl taka sær av amtmansembætinum[131]. Pløyen fór 18. juni 1840 til Keypmannahavnar við skonnartini „Havfruen", so málið er helst umrøtt, meðan hann var har.

Umframt sínar egnu klagur hevði Pløyen eisini adressuna frá føroyingum við sær á ferðini. Tað er ógreitt, hvussu gekst við málinum, eftir at Pløyen kom til Danmarkar, men áðrenn 5. september hevði kansellíið avgjørt at seta niður eina nevnd at viðgera „den færøske Frihandel", tí tann dagin sendi kansellíið boð um, at Hunderup sorinskrivari skuldi koma til Danmarkar at taka lut í nevndararbeiðinum[132]. Pløyen vildi eisini taka lut í hesum arbeiðinum, og hann bað tí um at sleppa at verða verandi í Danmark henda veturin, og 7. november 1840 fekk hann bræv frá Rentukamarinum um, at amtmaðurin slapp at verða verandi, so hann kundi luttaka í nevndararbeiðinum, sum nú varð nevnt „angaaende de grønlandske og færøske handels anliggender".[133] Sostatt varð eitt úrslit av adressuni og klagunum, sum Pløyen amtmaður hevði við sær til Danmarkar, at enn ein nevnd varð sett at viðgera føroyska handilin. Tað nevndararbeiðið verður vent aftur til í 12. kapitli.

### 10.2.2 Garde próstur ger misnøgdina almenna

Í undanfarnu kapitlum sóu vit, at hinir embætismenninir stuðlaðu Pløyen í stríðnum móti Einahandlinum, og meðan málið um handilin var til viðgerðar í nevnd í Keypmannahavn, kom ein bók út, sum vísti, at eisini hægsti kirkjuligi myndugleikin var á somu síðu sum Pløyen í málinum um avtøkuna av Einahandlinum.

Á vári 1841 gav C.B. Garde próstur út bók, nevnd *Et Par Ord om Den kongelige færøske Handels Bestyrelse*. Bókina hevði hann skrivað, tí at fútin í grein síni í blaðnum „Dagen" hevði sagt, at mótstøðan móti Einahandlinum var íkomin av høgu vøruprísunum. Harumframt høvdu aðrar kreftir roynt at sagt, at adressan, sum 9/10 av húsfedrunum í Føroyum høvdu undirskrivað, í veruleikanum ikki var eitt ynski um fríhandil, og tað vildi prósturin ikki hava standandi ósvarað. Málið við bókini var at „sætte rette Vedkommende i Kundskab om denne Misfornøielses Beskaffenhed." Tí fór hann at seta fram „de væsentligste Ankeposter, som have gjort det kongelige Monopol, der efter Kongens Hensigt skulde og virkelig kunde føres til Landets Velsignelse, til et utaaleligt Aag for Færingerne, og efter min Overbeviisning have særdeles meget bidraget til at fremkalde Ønsket om Frihandel." (Garde 1970: 122).

---

131 TSS. Færø Amt. Kopibók S, bræv nr. 784. Bræv frá Pløyen amtmanni til fleiri embætismenn dagfest 12. juni 1840.

132 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 247. Bræv frá Det Kongelige Danske Cancelli til amtmannin dagfest 5. september 1840

133 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 434. Bræv frá Rentukamarinum til Pløyen dagfest 7. november 1840.



*Christian Benedictus Garde próstur fanst at, hvussu Einahandilin varð rikin. (Mynd: geni.com)*

Í bókini legði hann mestsum alla ábyrgdina av, at mótstøðan móti Einahandlinum var vorðin so stór, á Nolsøe handilsforvaltara. Hann tók fram ymisk viðurskifti, sum í stóran mun samsvaraðu við tað, sum Pløyen í skrivi sínum hevði greitt Rentukamarinum frá. Klagurnar vóru um, at vørur altíð mangladu í Havn, og úti í úthandlinum var heilt bedrøviligt í so máta. Harumframt gekk avgreiðslan í handlunum alt ov seint fyri seg, serliga tá ið grind hevði verið, og handilin ikki hevði nóg mikið av tunnum til at taka ímóti lýsinum. Próstur klagaði eisini um, hvussu handilin fór við vørunum, tí bæði kornið, sum skuldi seljast í Føroyum, og turri fiskurin, sum skuldi sendast uttanlands, spiltust, meðan handilin hevði tey í varðveitslu. At enda klagaði próstur eisini um viðferðina, fólk fingu í handlinum.

Grovasta ákæran hjá prósti hevði við forsýningina í úthandlunum at gera, tí prósturin helt, at tað var persónligur vinningur til handilsforvaltaran, sum gjørdi, at tað gekk so illa í úthandlunum. Próstur helt nevniliga, at ein orsøk til hesa støðuna var, at handilsforvaltarin gekk ímóti tilráðingini hjá amtmanninum um at fáa til vega eina góða fynska jakt til at taka sær av flutninginum millum handlarnar. Ístaðin varð nógvur peningur nýttur til at gera „Thorshavn" um til

*Bókin* Et Par Ord om Den kongelige færøske Handels Bestyrelse *elvdi til áralangt og umfatandi rættarmál millum handilsforvaltaran og próstin. (Mynd: Landsbókasavnið)*



E. MADSEN
LÆGE

Tillæg

til

„Et Par Ord om den kongelige færøeske Handels Bestyrelse"

af

C. B. Garde,

Provst paa Færøerne og Sognepræst til Østerø.

Kjøbenhavn.

Forlagt af Universitetsboghandler C. A. Reitzel.
Trykt i Bianco Lunos Bogtrykkeri.
1841.

at sigla við farmi, og í 1838 fekk Nolsøe handilsforvaltari skipstimburmannin, sum var komin at umbyggja „Thorshavn", at byggja sær sjálvum ein deksbát, sum hann segði skuldi brúkast til fiskarí. Próstur helt, at lítið høpi var í hesi ætlanini, tí handilsforvaltarin hevði longu skonnartina „Nolsøe" undir umsjón, og hon varð løgd, tí fiskivinna fekst ikki at bera seg við henni. Próstur segði, at „De Klartseende erklærede derfor strax, at noget Andet maatte stikke bag ved."

Hvat tað var, kom skjótt til sjóndar, tí tá ið báturin „Ebenezer" var liðugur, fór hann á fiskarí, men longu dagin eftir kom hann innaftur, tí veðrið var ikki til vildar. Tá fekk „Ebenezer" ein túr at sigla fyri Einahandilin, og eftir tann túrin varð hildið, at báturin egnaði seg sera væl at hjálpa „Thorshavn" at røkja sambandið millum handlarnar. Soleiðis gjørdist fiskifarið hjá handilsforvaltaranum til hansara privata farmaskip. Á tann hátt kundi handilsforvaltarin misbrúka sína støðu til egið gagn. Trupulleikin var bara, at hetta varð gjørt á ein hátt, sum hevði við sær, at støðan varð verri í úthandlunum, enn hon kundi verið (Garde 1970: 127).

Niðurstøðan av bókini var í øllum førum púra greitt tann, at orsøkin til, at føroyingar vóru so ónøgdir við Einahandlin, var mátin, sum handilsforvaltarin rak handilin uppá. Hesin mátin komst partvís av dovinskapi og ódugnasemi, men eisini av, at handilsforvaltarin misnýtti sína støðu til at vinna sær sjálvum eina eyka inntøku.



*Ein av ákærunum móti handilsforvaltaranum var, at hann persónliga ríkaði seg upp við at lata "Ebenezer" sigla fyri handilin. Skiparin Dánjal Danielsen gjørdi hetta modellið av sluppini. (Mynd: Tjóðsavnið 8779F160)*

Hetta við, at teir, sum stýrdu handlinum, í veruleikanum eyðrændu føroyska samfelagið, kom eisini til sjóndar í verjuritinum, sum fyrrverandi bókhaldarin í føroyska handlinum í Keypmannahavn, C.A. Muhle, skrivaði í 1844. Í ritinum vildi hann vera við, at Nolsøe handilsforvaltari var ósekur í øllum ákærum, og at trupulleikarnir komu av, at tveir av teimum trimum limunum í Handilsstjórnini bara sótu har fyri egnan vinning. Limirnir í handilsstjórnini fingu 10½ % av yvirskotinum hjá handlinum, og tí vóru teir sjálvandi ikki áhugaðir í at avtaka hann ella gera nakað, sum minkaði um yvirskotið, sjálvt um tað var til gagns fyri føroyingar. Um triðja limin, Captain Graah, segði Muhle, at hann hevði ikki gloymt, „at Embedsmanden er til for Statens Skyld, og Staten derimod ikke for hans." (Muhle 1970a: 39).

Tað var tí kanska ikki so løgið, at júst Captain Graah, sum var bæði flota-yvirmaður og kendur polargranskari, gjørdist eitt slag av millummanni í hesi støðuni. Hann fór í 1840 til Føroya at kanna umstøðurnar og var í Føroyum í 5 vikur. Hann var m.a. í úthandlinum í Klaksvík einaferð út á heystið, og tá bað ein bóndi Graah koma at hyggja at fiskinum. Hann greiddi honum frá, at hann ongantíð fyrr hevði latið handlinum so harðan og hvítan fisk, sum hann hevði

*Captain Graah var fyrsti limurin í stjórnini fyri føroyska handilin, sum vitjaði Føroyar. (Mynd: wikicommons)*



gjørt hetta várið, men nú var fiskurin vorðin bleytur, gráur og plettutur, tí hann hevði ligið so leingi í einum vátum pakkhúsi. Garde hevði hoyrt, at Graah var misnøgdur við hesa støðuna, og at hann ætlaði at gera nakað við tað, tá ið hann kom aftur til Keypmannahavnar (Garde 1970: 133).

At Graah varð nýttur sum prógv uppá, at uppáhaldini um óskilið í úthandlinum í Klaksvík vóru røtt, kom helst ikki so væl við hjá Graah, tá ið bókin um ringa skilið í Einahandlinum kom út í Keypmannahavn. Hann føldi seg tí noyddan at svara aftur alment, og tað gjørdi hann í blaðnum „Fædrelandet" 15. juni 1841. Í svari sínum segði Graah, at hann hevði álagt handilsforvaltaranum at greiða Handilsstjórnini frá ringu støðuni við pakkhúsplássi í Klaksvík, so skjótt sum høvi beyðst, og hann bað hann gera eina grund til eitt nýtt pakkhús um veturin, so at eitt nýtt hús kundi byggjast várið eftir. Hann hevði eisini greitt Handilsstjórnini frá óhepnu støðuni, men um einki var hent, so var orsøkin helst, at eingin vildi brúka 8 til 10.000 ríkisdálar úr kongligu kassunum nú, tá ið fríhandilin var til viðgerðar. Graah váttaði kortini, at hann hevði hoyrt nógvar klagur um handilin, bæði tær, sum Garde sjálvur hevði skrivað um, og fleiri aðrar. Hann helt kortini, at nógvar av hesum klagunum vóru burtur nú, tí handilin hevði roynt at gjørt tillagingar. Annars ætlaði Graah sær ikki at verja hvørki handilsforvaltaran eller Handilsstjórnina, men hann helt kortini, at Handilsstjórnin ofta var avmarkað í

sínum virksemi, tí henni vantaði upplýsingar um støðuna í Føroyum. Viðvíkjandi handilsforvaltaranum helt hann, at tað var vert at hava í huga, at hann var ein gamal maður av tí gamla skúlanum, og við einari so stórari uppgávu sum hansara var ógjørligt at gera øllum til vildar[134].

Henda greinin gjørdist byrjanin til eitt stutt blaðstríð millum Graah og Garde próst, sum endaði við, at próstur gav enn eina bók út, nevnd *Tillæg til „Et Par Ord om den kongelige færøeske Handels Bestyrelse"*. Óneyðugt er at koma nærri inn á blaðstríðið sjálvt í hesi ritgerðini, men áhugavert er at síggja, at Graah upp á ein spurning um, hví limir í Handilsstjórnini ikki oftari høvdu vitjað í Føroyum, um teimum vantaði upplýsingar, svaraði, at higartil høvdu „Indbyggerne vare saare tilfredse med den kongelige Handel, hvorom de færøeske Embedsmænd, Amtmænd, Landfogder og Sorenskriver indtil den allerseneste Tid have været aldeles enige."[135] Hetta er ein greið ábending um, at misnøgdin við Einahandilin kom eitt sindur óvart á stjórnarlimir og forvaltarar, og at tað var broytti hugburðurin hjá embætismonnunum til Einahandilin, sum hevði broytt hugsanina hjá fólkinum.

## *10.3 Handilsmyndugleikarnir svara aftur*

Myndugleikarnir hoyrdu atfinningarnar og fóru at kanna, hvat gerast kundi fyri at minka um misnøgdina. Teir komu fram til, at misnøgdin serliga stavaði frá hækkaðum prísum á vørum, og sambært handilsforvaltaran var henda príshækking eitt úrslit av fyriskipan um handilin frá 16. desember 1834. Fyriskipanin gjørdi, at prísbroytingar á marknaðinum í Keypmannahavn merktust væl betri í Føroyum, enn tær høvdu gjørt frammanundan. Hesar prísbroytingar merktust serliga væl, tá ið vánalig kornár vóru í Danmark, og sambært Lunddahl fúta gjørdi prísvøksturin á serliga byggi, at føroyingar fóru at halda, at støðan illa kundi gerast verri undir fríum handli[136].

Tí var loysnin í fyrstu syftu at áseta ein hámarksprís á korni. Avgjørt varð tí, at prísurin skuldi vera ein ríkisdáli og 16 skillingar oman á innkeypsprísin, men prísurin mátti ongantíð fara upp um 4 ríkisdálar og 64 skillingar fyri tunnuna. Henda prísbroyting gjørdi uttan iva stóran mun hjá mongum føroyingi, tí í 1840 kostaði ein tunna av byggi 5 ríkisdálar og 8 skillingar (Nolsøe og Jespersen 2009: 315–316). Eisini Handilsstjórnin og Rentukamarið hildu, at við hesari avgerð høvdu teir „draget Omsorg for, at ingen grundet Klage i Fremtiden vil kunne fremføres med Hensyn til Taxten paa Byg."[137] Sambært Nolsøe handilsforvaltara

134 „Fædrelandet" nr. 549 frá 15. juni 1841.
135 „Fædrelandet" nr. 605 frá 10. august 1841. „I Anledning af Provst Gardes Stykke i Nr. 601"
136 „Dagen" nr. 231 frá 5. oktober 1840.
137 SA. Rentukamarið. 1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland). Álit nr 462 frá 18. august 1841, sum er grundarlag undir kongligu resolutiónini 14. september 1841.

ruddaði fyriskipanin frá 31. mars 1841 tað mesta av misnøgdini við Einahandilin av vegnum (Nolsøe 1841: 7), og hon var tí møguliga eisini ein orsøk til, at føroyingar í 1841 fóru at savna undirskriftir ímóti tí, sum tey flestu høvdu undirskrivað árið fyri.

Atfinningarsama bókin hjá Garde prósti kom sjálvandi ikki væl við hjá kongi og umsiting hansara, og 21. juni 1841 gav kongur Rentukamarinum boð um at spyrja seg fyri hjá Handilsstjórnini og síðani skriva sær eitt álit um, hvat ræ ttast var at gera. Rentukamarið fekk tvær frágreiðingar frá Handilsstjórnini, eina frá Captain Graah og eina frá hinum báðum limunum.

Tá ið Rentukamarið tók samanum, býtti tað kritikkin frá Garde í fýra punkt. Tað fyrsta var, at allar vørur, sum tørvur var á, fingust ikki í handlinum. Annað punkt var, at avgreiðslan í handlunum var ov sein, og tí spiltu fólk nógv av síni dýrabaru tíð. Triðja punktið var, at vørurnar, bæði innfluttar og útflutningsvørur, ikki vóru nóg væl varðveittar í handlinum, og tað fjórða var, at fólk, sum komu í handilin, ofta upplivdu, at handilsfólkini vóru tvør og harðlig, og tí fingu tey ofta eina óræ ttvísa viðferð.

### 10.3.1 Handilsstjórnin verjir seg

Handilsstjórnin greiddi frá, at hon hvørt ár fekk ein bíleggingarlista, sum handilsforvaltarin hevði skrivað, og sum amtmaðurin síðani hevði gjørt viðmerkingar til og broytingar í. Handilsstjórnin hevði trúliga sent allar vørur, sum vóru á hesum lista til Føroya, so hon helt, at henda klagan var púra ógrundað og í øllum førum ógvuliga yvirdrivin. Handilsstjórnin ásannaði kortini, at tað kundi henda, at onkur vøra var uppi, men hon helt ikki, at tað kundi ábyrgdast hvørki sær, handilsforvaltaranum ella amtmanninum, tí trupulleikin kom av, at vælhavandi fólk av onkrari orsøk brádliga fóru at halda, at einstakar vørur fóru at gerast væl dýrari árið eftir, og tí keyptu tey inn undir seg. Ein annar trupulleiki var, at tá ið nógv grind hevði verið, eftir at siglingin millum londini var av, fingu fólk meira pening um hendi enn vanligt, og tí keyptu tey eisini meira. Vørugoymslan var gjørd til vanligu nýtsluna, so undir slíkum umstøðum var tað sjálvsagt, at handlinum kom at vanta ávísar vørur. Onnur viðurskifti vóru eisini tikin fram undir hesum punkti, men niðurstøðan var greið, og hon var, at tað var ikki fólkið í handlinum, sum hevði ábyrgdina av manglandi vøru.

Viðvíkjandi ov seinari avgreiðslu við handilin hevði Handilsstjórnin svarað Rentukamarinum, at Captain Graah hevði kannað umstøðurnar, og orsøkin til hesar klagur var, at umstøðurnar at taka ímóti grindalýsi ikki vóru nøktandi, og at bara tveir mans arbeiddu í handlinum í Klaksvík. Handilsstjórnin helt, at hesin trupulleikin longu var loystur, tí at lýsibakkar vóru bygdir at taka ímóti lýsi, so at fólk ikki nýttist at bíða, til tunnur vóru klárar. Viðvíkjandi talinum á handilsfólki helt Handilsstjórnin ikki, at tað var ráðiligt at seta fleiri, tí meginpartin av árinum fór ikki at verða nóg nógv arbeiði til so nógv fólk. Tað var bara, tá ið



*Nógvu grindirnar í 1840 gjørdu, at fólk høvdu nokk av mati og væl av peningi. Tí var eftirspurningurin í handlinum stórur eftir luksusvørum, sum handilin ikki hevði nóg mikið av, og hinvegin var ikki brúk fyri øllum teimum neyðsynjarvørunum, sum handilin hevði á lagri. Ójavnt var, hvussu nógvar grindir løgdu beinini á hvørjum ári, og tað gjørdi tað torført hjá Einahandlinum at bíleggja ta vøruna, sum tørvur var á hvørt einstakt ár. (Mynd: Tjóðsavnið 7077F055)*

stór grind hevði verið, at trýst kom á avgreiðsluna, og tað var vónandi bøtt upp á tað við lýsibakkunum.

Um triðja punkt í klagunum vildi Handilsstjórnin heldur ikki viðganga nakran feil. Hon helt, at alt, sum gerast kundi, var gjørt fyri, at kornið, sum varð sent til Føroya, skuldi vera gott. Trupulleikar vóru við einari last í 1839, sum varð send retur, men sjálvt tá ið hon kom aftur til Keypmannahavnar, kundi lastin seljast fyri næstan fullan prís, so her mundi tað heldur vera sýnsmenninir, sum ikki dugdu sítt arbeiði, enn at handilin hevði gjørt nakað galið. Klagurnar um versnaða góðsku á avreiddum fiski vildi Handilsstjórnin heldur ikki kennast við, tí føroyski fiskurin fekk besta prísin av øllum í Keypmannahavn. Onkur trupulleiki hevði verið í Klaksvík, tí pakkhúsplássið var so avmarkað, men at slíkir trupulleikar skuldu hava nakra ávirkan á prísin árið eftir, soleiðis sum Garde hevði hildið uppá, tað passaði ikki.

Fyri Handilsstjórnina var tað púra nýtt, at fólkini í handlunum skuldu vera harðlig og fara órættvíst við kundunum, so um nakað var um tað, so var Handilsstjórnin líka hørm um tað sum nakar annar. Hon helt kortini, at vert var at nevna, at hon kendi so lítið til Jacob Nolsøe, tá ið hann varð settur í starv

í 1832, at hon ivaðist í at mæla til, at hann fekk starvið, men hesi 9 árini, hann hevði verið handilsforvaltari, høvdu víst, at Handilsstjórnin kundi vera væl nøgd við hann og hansara virkisfýsni. Captain Graah hevði á vitjan síni fingið eitt størri innlit enn hinir báðir, og hann helt, at Nolsøe kundi vera eitt sindur intrigantur og viðhvørt tvørur og skjótur at øsa seg, men hann helt, at tað komst bara av, at hann var vorðin nakað gamal og tí skirvisligari, „samt at han er opdragen ved Handelen paa Færøerne paa en Tid, da man langtfra giorde saa store Fordringer som i den sildigere Tid.“ Hann hevði kortini spurt seg fyri og fann bara ein mann, sum klagaði um Nolsøe, og tað var ein persónligur fíggindi. Graah hevði spurt embætismenninar, um Nolsøe átti at verið koyrdur frá, men tí var eingin samdur í. Handilsstjórnin hevði tí onga orsøk at vera ónøgd við handilsforvaltaran, og hon helt tí, at handilsforvaltarin skuldi reinsa seg móti ákærunum hjá Garde prósti.

Handilsstjórnin helt sostatt ikki, at grundarlag var fyri nakrari av klagunum hjá Garde prósti, og vildi hava Nolsøe at taka stig til at fáa klagurnar dømdar deyðar at vera. Captain Graah legði afturat frágreiðingunum hjá Handilsstjórnini, at eftir hansara fatan var orsøkin til ónøgdina við handilin ikki at finna í klagunum hjá próstinum, tí hann helt orsøkina vera óhepnu konjunkturarnir, sum raktu føroyingar um somu tíð. Nógva avfallið í 1835 hevði við sær, at kornheystingin var vánalig í Føroyum, og tí var tørvur á at keypa meira korn, men byggið, sum var breyðkornið í Føroyum, var samstundis vorðið sera dýrt í Danmark, so føroyingar noyddust brádliga at keypa meira korn enn vanligt fyri hægri prís enn vanligt.

Rentukamarið tók í høvuðsheitum undir við frágreiðingin frá Handilsstjórnini. Tað helt ikki, at handilin á nakran hátt kundi ábyrgdast fyri vantandi vøru, tí tá ið landsins hægsti embætismaður hevði góðkent bíleggingarlistan, „skjøner Kammeret ikke, at beder Garantie kan gives.“ Viðvíkjandi vantandi pakkhúsplássi á tveimum úthandlum hevði Handilsstjórnin fingið boð um tað, men hon helt ikki, at hon kundi gera so nógv við tað, fyrr enn nevndin, sum arbeiddi við føroyska handlinum, var liðug við sítt arbeiði. Nú var so eitt uppskot komið um, hvat gerast skuldi, og málið lá hjá Direktionen for Statsgjælden.

Niðurstøðan hjá Rentukamarinum var:

> Naar man med et samlet Overblik betragter hele det her omhandlede Skrivt, skiønnes ikke rettere, end at samme fortiener i høi Grad at misbilliges formedelst det under alle Omstændigheder høist Uforsvarlige i, at Forfatteren istedetfor til Rentekammeret eller i alt Fald directe til Deres Maiestæt at fremføre hvad han maatte formene, at der kunde være at udsætte paa Handelens Bestyrelse, har ladet sine Beskyldninger bekiendtgiøre ved Trykken, hvormed han saavel efter sin Stilling som ved den Tone, hvori han har skrevet, nødvendig har maattet fremkalde Mistillid hos Færingerne med hele Handelsbestyrelsen, en Mistillid, der desuden hvad de væsentligste Hovedanker betræffer, vistnok er aldeles uforskyldt.

Rentukamarið helt ikki, at nøkur orsøk var til at gera meira við trý tey fyrstu punktini í klagunum hjá prósti, og tað tók eisini undir við Handilsstjórnini í, at Nolsøe handilsforvaltari skuldi fara í rættin við próstinum, so at persónligu ákærurnar móti honum kundu dømast deyðar at vera[138].

Við hesum álitinum sum grundarlag skrivaði Rentukamarið eitt uppskot um eina resolutión til kong. Í resolutiónini álegði kongur handilsforvaltaranum at stevna Garde próst fyri ærumeiðing, men resolutiónin snúði seg mest um, at Pløyen amtmaður fekk álagt, at „med muligste Nøiagtighed og Omhue at paasee, at Vare-Requisitionerne betimeligen nedsendes og indeholde, saavidt saadant lader sig forud bestemme, de Vare-Quantiteter, i Særdeleshed af Fornødenheds Artikler, som til Landets Proviantering maae ansees fornødne, og som kunde fyldestgjøre Indbyggernes billige Fordringer til den kongelige Handel.“

**10.3.2 Nolsøe svarar aftur**

Handilsforvaltarin Jákup Nolsøe royndi eisini í sínum lagi at verja seg móti ákærunum frá próstinum, og tað gjørdi, at hann í 1841 skrivaði eina bók nevnd *Beretning om den kongelige færøiske Handels Organisation og dens Bestyrelse paa Færøerne*. Í bókini ætlaði hann at vísa aftur ákærunum frá Garde, og hann vildi eisini forða fyri, at tað „skal lykkes ham at mislede det ærede danske Publicum saaledes, som det synes at have været hans Hensigt, og som Udfaldet vil vise, hvorvidt han har opnaaet blandt mine Landsmænd.“ (Nolsøe 1841: 4)

Nolsøe helt als ikki, at adressan vísti, at føroyingar ynsktu fríhandil, og hann helt eisini, at tann fyriskipanin, sum varð sett í gildi 31. mars 1841, hevði „aldeles forandret Færingernes Mening“, soleiðis at nú var breið undirtøka fyri at varðveita Einahandilin (Nolsøe 1841: 7). Nolsøe helt, at besta skipanin fyri Føroyar var „et vel organiseret, dygtigt og humant bestyret Monopol“, og tí setti hann sær fyri í bókini at lýsa „det Kongelige færøiske Monopols fortrinlige Organisation“ (Nolsøe 1841: 11). So kundu fólk taka støðu fyri og ímóti sjónarmiðunum hjá sær og próstinum.

Í lýsing síni greiddi forvaltarin frá, at tað í stóran mun var „den stedse tiltagende Luxus“, sum gjørdi, at vørumangul kundi koma í handlinum. Hesum átti m.a. próstur at mótarbeitt, men tað gjørdi hann ikki. Eftirspurningurin var eisini nógv øktur av úthandlunum, og við tølum greiddi hann frá, hvussu nógv nýtslan av kaffi, sukuri, siruppi og tubakki var økt frá 1806 til 1840. Í 1840 hevði nógv grind eisini havt við sær, at fólk hevði meira pening at nýta, samstundis sum tørvurin á at keypa matvørur minkaði. Tað hevði við sær, at 3000 tunnur av byggi ikki vóru seldar, tá ið fyrsta várskipið kom við nýggjari vøru, samstundis sum misnøgdin var stór orsakað av vantandi luksusvørum (Nolsøe 1841: 18).

138 SA. Rentukamarið. 1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland). Øll henda langa frágreiðingin er álit nr 462 frá 18. august 1841, sum er grundarlag undir kongligu resolutiónini 14. september 1841.

Í bókini brúkti Nolsøe nógv tað tjóðskaparliga. Hann vísti m.a. á, at um føroyingar sjálvir høvdu skipað fyri at bygt úthandlarnar, so hevði handilin í Klaksvík verið størri enn hinir, tí so stórur partur av landinum kundi verið avgreiddur úr Klaksvík (Nolsøe 1841: 23). At handilin har var so lítil, var orsøk til allar tær klagur, sum bæði Garde og Pløyen høvdu greitt frá. At 26 bátar vóru komnir til Klaksvíkar samstundis, var so óvanligt, at hann helt seg hava orsøk til at halda, at onkur hevði skipað fyri hesum fyri at fáa fólk at klaga. Hann helt, at „visse Folk havde nu engang sat sig i Hovedet, at Frihandel burde indføres, og derfor lagdes hemmeligen alle muelige Hindringer i Veien for, at disse gavnlige Indretninger kunde paaskjønnes af Indbyggerne." (Nolsøe 1841: 24).

Nolsøe vísti eisini aftur øllum ákærum um, at hann við „Ebenezer" fekk eina stóra persónliga inntøku, samstundis sum flutningurin millum handlarnar ikki gjørdist so góður, sum hann kundi verið, og hann helt heldur ikki, at handilin kundi ákærast fyri at hava misrøkt sína uppgávu, tá tunnur fóru at vanta í til lýsi. Hansara grundgeving var, at tað hevði verið ábygdarleyst av handlinum at havt so nógvar tunnur klárar, tí um brúk ikki varð fyri teimum, so høvdu tær farist upp á stutta tíð, og so hevði handilin havt eina stóra útreiðslu til onga nyttu (Nolsøe 1841: 34). Harumframt kom, at alt tunnugóðsið, sum handilin hevði bílagt í 1839, ikki kom fram, og tað var ongantíð útflutt so nógv lýsi fyrr, sum tað var í 1840, og tað hevði heldur ongantíð verið roknað við, at tørvurin á tunnum fór at gerast so stórur, sum hann gjørdist (Nolsøe 1841: 39). Eftir at hava afturvíst, at handilsforvaltarin hevði nakran fyrimun av svinnprosentunum, og at handilin var orsøk til vánaliga fiskin í handilskjallaranum í Klaksvík, endaði handilsforvaltarin tann partin av bókini við at siga, at hann vónaði, at „Jeg nu har sat saadant Kryderie paa de 3 Retter Mad, hvormed Provst Garde har opvartet sine Læsere, at de nok have tilstrækkelig fordøiet dem, som mine Læsere." (Nolsøe 1841: 46).

Restina av bókini brúkti Nolsøe til at greiða frá, at hann sjálvur kom úr somu fátøku korum, sum føroyingar flest livdu undir (Nolsøe 1841: 48), og hann helt, at tað tænti donsku stjórnini til rós, at hon soleiðis hevði givið einum av „Undersaatternes fortjenstfulde Adgang til Statens Embedsværdighed." Tað ivaðist hann heldur ikki í, at „de fleste Færinger" vóru samdir við honum í, og prógvið var m.a., at íbúgvar landsins onkursvegna guldu teir 5000 ríkisdálarnar, sum hann skuldi seta í veð, tá ið hann tók við sum handilsforvaltari. Hann royndi við hesum at siga, at tað var eitt ynski hjá føroyingum, at hann sum ein av teirra egnu stýrdi handlinum, meðan aðrir stættarbólkar ikki vóru so fegnir um hesa støðuna. „Derpaa er Provstens Skrift, efter min Mening, et uomtvisteligt Beviis." (Nolsøe 1841: 51).

Sama tjóðskaparliga munin vísti Nolsøe á, tá ið hann staðfesti, at bara ein av teimum, sum arbeiddu í handlinum, var ikki føddur í Føroyum (Nolsøe 1841: 51). Hesi starvsfólk og hann sjálvur høvdu staðið fyri teirri øgiligu framgongd, sum Einahandilin hevði verið ígjøgnum síðstu árini við bygging av úthandlunum,


Beretning
Foreningen
„De danske Atlanterhavsøer".
den Kongelige færøiske Handels
Organisation,
og
dens Bestyrelse paa Færøerne;
foranlediget
ved
Provst C. H. Gardes Skrift,
betitlet:
„Et Par Ord om den Kongelige færøiske Handels
Bestyrelse."
af
J. Nolsøe,
Kongelig Handelsforvalter paa Færøerne.
Kjøbenhavn.
I Commission hos Andr. Fred. Høst.
Trykt i Bianco Lunos Bogtrykkeri.
1841.
105
6356

*Jákup Nolsøe handilsforvaltari royndi í bókini* Beretning om den kongelige færøiske Handels Organisation og dens Bestyrelse paa Færøerne *at verja seg ímóti álopunum hjá prósti. (Mynd: Landsbókasavnið)*

nýggjum pakkhúsum og stórum vøkstri í handfaringini av bæði innfluttum vørum og útflutningsvørum. Harumframt hevði handilin fingið nógv meira umsiting, tí hann skuldi umsita kontur hjá bæði Sparikassanum og alskyns almennum stovnum. Harumframt kom, at lossinginarmenninir í Havn nú vóru so dugnaligir, at skipini tóku teir við sær út á bygd, tí at tá slapst undan tvørleikum av ymiskum slag, og umborð á smáu farmaskipunum var øll manningin føroysk, og teir høvdu við tíðini prógvað, hvussu væl teir dugdu sítt arbeiði. Alt hetta hevði gjørt, at handilin hevði havt stórt yvirskot síðstu mongu árini (Nolsøe 1841: 56).

Nolsøe endaði bókina við at siga, at hann fegin tók stríðshandskan upp, um onkur blakaði honum hann, og álopið sá út til at vera vert at verja seg ímóti. Var tað ikki tað, so fór hann at „lee deraf, og sove rolig." (Nolsøe 1841: 58).

Tað almenna orðaskiftið, sum Nolsøe legði upp til, kom ongantíð, tí stutt eftir, at bókin kom út, fekk hann boðini frá Rentukamarinum um at saksøkja próstin fyri ærumeiðing. Nolsøe stevndi helst Garde í septembermánað, og áðrenn mánaðurin var úti, hevði Garde í sínum lagi eisini stevnt handilsforvaltaran 25. september fyri ærumeiðingar, sum hann helt handilsforvaltaran vera komnan við í sínari bók. Prósturin boðaði frá stevning sínari í donskum bløðum 30. september[139].

139 Kiøbenhavns Kongelig alene priviligerede Adresse-Comptoirs Efterretninger nr. 251 frá 26. oktober 1841

Summarið eftir vórðu fleiri av úttalilsunum hjá bæði próstinum og handilsforvaltaranum dømd deyð at vera, og báðir fingu bót. Nolsøe legði báðar dómarnar hjá Føroya rætti fyri hægri rætt. Yvirrætturin í Keypmannahavn kom 16. januar 1845 til eina aðra niðurstøðu í málinum, og hann gav Nolsøe viðhald í, at Føroya rættur hevði felt skeivan dóm í málinum, har Garde hevði stevnt Nolsøe. Í tíðindastubbanum, sum stóð í donskum bløðum um hesa avgerð, varð nevnt, at hetta vóru „volumineuse Sager“[140], so vónandi verður einaferð seinni høvi til at kanna innihaldið í hesum báðum málunum nærri.

Lítið man vera at ivast í, at ákærurnar í bókunum hjá Garde og Nolsøe hava ávirkað arbeiðið hjá nevndini, sum skuldi viðgera spurningin um handilin í Føroyum. Hesin tvídrátturin vísir greitt, at donsku embætismenninir í Føroyum vildu sleppa av við Einahandilin. Garde helt uppá, at tað eisini var eitt ynski millum føroyingar, men hesum var Nolsøe als ikki samdur í. Hann róði framundir, at tað bara vóru somu embætismenn, sum á ymsan hátt royndu at eggja til misnøgd millum føroyingar, men at fólk sum heild vóru glað fyri handilsviðurskiftini, soleiðis sum tey nú vóru.

## *10.4 Samandráttur*

Misnøgdin við Einahandilin var stór á heysti 1839. Tað hevði við sær, at ynski varð sett fram um fríhandil í einari kvøðu til nýggja kongin, Kristian 8. Nærum hvørt húsarhald í landinum skrivaði undir hesa kvøðu, men óvissan var eisini stór, um tað í veruleikanum merkti, at føroyingar sum heild vildu hava fríhandil. Fleiri tekin eru um, at tað var trúskapur móti myndugleikunum, sum fingu føroyingar at taka undir við ynskinum um at gera broytingar í handilsviðurskiftunum. Talan var við øðrum orðum um eina hugsjónarliga kollvelting úr erva.

Tann ónøgdin, sum sást millum føroyingar, bygdi ikki á hugsjónarligar hugsanir, men var grundað á, at Einahandilin var ov illa rikin, og á øktar prísir á neyðsynjarvørum. Tí kom tað í stóran mun at verða arbeiðið hjá handilsforvaltaranum, sum stóð fyri skotum.

Í fyrstu syftu royndu Handilsstjórnin og Rentukamarið at koma atfinningunum til lívs við at seta ein hámarksprís á korn 31. mars 1841. Tað gjørdi helst sítt til, at misnøgdin millum føroyingar minkaði aftur, og var við til at gera, at ein nýggj innsavning av undirskriftum fór kring landið, sum hevði til endamáls at mótmæla undirskriftunum, sum vóru savnaðar árið fyri.

Við hesum príspolitiska átakinum hildu myndugleikarnir seg hava gjørt tað, sum teir kundu gera, at ganga atfinningunum á møti. Men tað steðgaði ikki øllum atfinnarunum, og fyri myndugleikarnar var tað serliga óheppið, at Garde próstur við bók síni í 1841 gjørdi atfinningarnar móti Einahandlinum almennar í Danmark. Fyri Rentukamarið var stórur munur á at fáa atfinningar, og at

140 Aalborgs Stiftstidende og Adresse-Avis nr. 15 frá 17. januar 1845.

hesar somu atfinningar gjørdust almennar. Teir vildu hava Handilsstjórnina at viðmerkja atfinningarnar, og tá ið Handilsstjórnin svaraði, at tær allar samlar vóru púra ógrundaðar, tók Rentukamarið undir við tí. Niðurstøðan varð, at teir samsvarandi hugsanini hjá Handilsstjórnini vildu hava, at Nolsøe handilsforvaltari fór í rættin við Garde prósti, so at almennu atfinningarnar vórðu dømdar deyðar at verða. Sostatt fóru handilsmyndugleikarnir heldur í herðnað ímóti teimum, sum funnust at Einahandlinum, enn at taka nakra atfinning til eftirtektar.

# *11. kapittul*
# *Vinnuligur útróður og turrur fiskur*

Í undanfarna kapitli sást, at misnøgd við Einahandilin hevði við sær, at Rentukamarið 31. mars 1841 gjørdi eina resolutión, sum hevði til endamáls at steðga misnøgdini. Høvuðsendamálið við resolutiónini var at avmarka prísin á korni, men aðrar príspolitiskar broytingar vóru eisini gjørdar í resolutiónini, sum ávirkaðu møguleikarnar fyri at seta gongd á eina fiskivinnu í Føroyum.

Sambært nevndini, sum skuldi skriva álit um føroyska og grønlendska handilin, var tað uppskotið frá Pløyen frá 26. februar 1839, sum gjørdi, at fiskivinna gjørdist partur av kongligu fyriskipanini frá 31. mars 1841[141]. Tí er helst ikki so nógvur ivi um, at orsøkin til, at Handilsstjórnin og seinni eisini Rentukamarið á vári 1841 gingu við til fremja nøkur tiltøk til frama fyri eina komandi fiskivinnu í Føroyum, var, at í hvussu er Handilsstjórnin føldi seg kroysta til at gera okkurt við ynskini hjá Pløyen. Samstundis er lítið at ivast í, at Pløyen amtmaður royndi at gera sína ávirkan galdandi, meðan hann var staddur í Danmark henda veturin, og allar klagurnar úr Føroyum skaptu ein góðan møguleika at fáa onkur uppskot gjørd til veruleika.

## *11.1 Príspolitikkur ella konjunkturtillaging*

Í resolutiónini frá 31. mars 1841 var avgjørt, at prísurin á ullvørum skuldi lækka við trimum skillingum fyri pundið, og samstundis hækkaði prísurin á bæði klippfiski og plattfiski úr 13 ríkisdálum og 32 skillingum upp í 16 ríkisdálar og 64 skillingar fyri skippundið. Tað vil siga, at prísurin fór úr 4 skillingum til 5 skillingar fyri pundið, og talan var sostatt um eina hækking á 25 %. Prísurin á turrum fiski fór úr 4 skillingum fyri pundið upp í 6 skillingar. Síðsta broytingin var, at vinningurin á teimum vørum, sum Einahandilin seldi til fiskivinnuna skuldi setast niður úr 33 1/3 % niður í 20 %. At enda varð eisini avgjørt, at saltfiskur ikki longur skuldi vera takstvøra hjá handlinum.

Tað hevur verið sagt, at hetta var ein miðvísur príspolitikkur, sum legði grundarlag undir ein nýggjan vinnubygnað í Føroyum, har farið varð frá landbúnaðarsamfelagi til fiskivinnusamfelag (Nolsøe og Jespersen 2009: 317), men tað er at gera í so nógv av, tí talan var neyvan um nakran miðvísan príspolitikk. Handilsstjórnin

---

141 SA. „Kongehuset, Frederik 7., konge, sager vedr. Færøerne 1844-45“. „Sager betræffende den intenderede Frihandel paa Færøerne“. Álit frá nevndini at viðgera føroyska og grønlendska handilin dagfest 25. apríl 1842. Hetta er avrit, sum Fríðrikur krúnprinsur fekk í samband við Føroyaferð sína í 1844.

royndi at ganga ynskjunum hjá Pløyen amtmanni á møti, og hon kundi lættliga gera tað júst tá, tí skiftandi marknaðarprísir í Keypmannahavn gjørdu, at hesar broytingar kundu gerast mestsum kostnaðarleyst fyri handilin.

Endamálið við at seta prísin á ullvørum niður var at økja um vinningin av hesi vøru. Hesin økti vinningurin skuldi so dekka tað tapið, sum handilin fekk av at seta vinningin niður á vørum, sum handilin seldi til fiskivinnuna. Broytingin fór ikki at merkjast í Føroyum, tí síðsta árið hevði handilin fingið so góðan prís fyri ullvørurnar á danska marknaðinum, at prísurin í handlinum komandi ár fór at gerast størri enn árið fyri, sjálvt um 3 skillingar vóru tiknir av hvørjum pundi[142]. Sostatt fór prísurin, sum føroyingar fingu fyri ullarvørur, ikki at minka, og tí ber heldur ikki til at tosa um, at talan var um nakra grundleggjandi uppgerð við gamlan príspolitikk.

Handilsstjórnin ásannaði, at „Fiskeriernes Opkomst under Færøerne er en Sag af den største Vigtighed", og tí var tað „vel ... et forsøg værd at komme til Kundskab om, hvorvidt de giorte Forslag kunnu tiene til at fremme den ommeldte Entreprise". Men tað vóru „de i Aar stedfindende Conjuncturer", sum vóru avgerandi, tí teir merktu, at henda royndin kundi gerast, uttan at handilin misti nakað av henni[143].

Longu árið eftir sást, at handilin framhaldandi royndi at halda fast í gamla kenda vinnumynstrið, tí tá minkaði Handilsstjórnin niðurskurðin í ullvøruprísunum, so at hann bara varð 2 skillingar, tí hon ásannaði, at útreiðslurnar av at lækka prísin á vørum til fiskivinnuna ikki høvdu kostað handlinum so nógv, sum roknað varð við. Samstundis ætlaði Handilsstjórnin eisini at hækka prísin á hosum við 7 skillingum og samsvarandi lækka prísin á troyggjum við 7 skillingum, tí hon óttaðist fyri, at vánaligur avsetningsprísur fór at hava við sær, at hosubindingin heilt steðgaði upp[144].

Sum heild merkti handilin hesa tíðina, at marknaðarprísurin á ullvørum fall á hvørjum ári, soleiðis at roknaði vinningurin, sum var bygdur upp á prísin árið fyri, gjørdist minni, enn handilin hevði væntað. Kortini valdi Handilsstjórnin í 1845 ikki at lækka prísin á ullvørunum so nógv, sum marknaðarprísurin legði upp til, tí „Uldgodset er Færingernes Hovedproduktion, som man, saavidt mueligt, bør søge vedligeholdt." Tí helt Handilsstjórnin eisini, at lækkingin á ullvøruprísinum, sum varð gjørd í 1841, skuldi avtakast, og „Bør bæres af Handelen selv."[145]

Sostatt var ongantíð talan um, at Handilsstjórnin ætlaði at føra ein miðvísan príspolitikk fyri at broyta føroyska vinnubygnaðin. Heldur var talan um, at

142 SA. „1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland)". Nr. 172. Resolution 31 te Marts 1841.

143 SA. „1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland)". Nr. 172. Resolution 31 te Marts 1841.

144 SA. „1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland)". Resolutión nr. 109 frá 16. mars 1842.

145 SA. „1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland)". Resolution af 26de Marts 1845.

Handilsstjórnin brúkti nakrar góðar konjunkturar í 1841 til at royna at stuðla fiskivinnuni eitt sindur, men so skjótt, sum konjunktarnir skiftu aftur, setti handilin eisini prísin á fiski niður, meðan hann gjørdi nógv fyri at halda prísunum á ullvørum uppi. Tað gjørdi hann í hvussu er partvíst, tí hann helt, at ullvørur framhaldandi skuldu vera høvuðsframleiðslan í Føroyum.

## *11.2 Turri fiskurin verður vinnulig vøra*

Prísbroytingin fekk lítla og onga ávirkan á framleiðsluna av klippfiski og saltfiski, men ein avgerandi broyting hendi í mynstrinum fyri avreiðingum av turrum fiski til handilin. Áðrenn prísbroytingina tykist tað, sum um avreiðingarnar bara vóru treytaðar av, hvussu nógv orka var til avlops í mun til alt annað arbeiði, sum skuldi gerast í landbúnaðarsamfelagnum, og hvussu nógvur fiskur hevði verið at fingið, meðan tað er týðiligt, at prísurin ávirkaði avreiðingarmongdina eftir 1841.

Tað sæst við at hyggja at útflutningstølunum fyri turran fisk úr Føroyum, har ein stórur vøkstur í útflutningsnøgdunum í 1841 og 1842 er týðiligur. Útflutningurin hevði í miðal verið 104.287 pund um árið síðani 1820 og ligið millum 23.808 pund tað vánaligasta og 217.056 pund tað besta árið, men í 1841 vaks hann brádliga upp í 342.320 pund og í 1842 heilt upp í 736.128 pund (Degn 1929: 139). Eingin orsøk er til at ivast í, at príshækkingin hetta árið átti sín stóra lut í hesum vøkstrinum, men ivasamt er, hvussu stór ávirkanin hevði verið, um tað bara var prísvøksturin, sum ávirkaði. Tvey onnur viðurskifti hendu um somu tíð, og broytingin í mynstrinum av avreiddum turrum fiski kann best skiljast við, at øll hesi trý ávirkaðu gongdina sama veg. Hinar báðar ávirkanirnar vóru, at nógvur sokallaður landfiskur var at fáa kring alt landið, og hesin summarfiskur gav góðan møguleika at gera nakrar royndir við at brúka línuna, sum menn høvdu sæð í Hetlandi. Náttúran, tøknin og príspolitikkurin gjørdu øll eitt lop rætta vegin samstundis.

### 11.2.1 Landfiskur aftur at fáa

Í 1841 var nógvur fiskur at fáa í øllum sýslum uttan Vága sýslu. Tað komst í stóran mun av, at sonevndi landfiskurin var komin aftur á firðir og víkir í stórum tali. Hesin fiskur var heilt inni við land, men hann hevði ikki verið at fingið í munandi nøgd í langa tíð[146]. Í frágreiðing til Handilsstjórnina greiddi Pløyen 15. november 1841 frá, at árið hevði verið „særdeles rigt, hvad Udbyttet af Fiskerierne angaar, og Fisken har i usædvanlig Mængde staaet under Landet.“ Trupulleikin við hesum summarfiskinum undir landi var tó, at hann var so rak, at tað var torført at fáa góða handilsvøru burtur úr honum. Hesin fiskur var meir at samanbera við tað, sum sambært fyriskipan frá 30. mai 1776 varð kallað skinnfiskur.

---

146 TSS. Færø Amt, Kopibók T, bræv nr. 96. Bræv við frágreiðing um landsins støðu til Rentukamarið dagfest 12. november 1841.



*At prísurin á turrum fiski varð øktur í 1841, hevði við sær, at turrur fiskur í størri mun enn fyrr gjørdist ein vinnulig vøra. (Mynd: Tjóðsavnið)*

Handilsforvaltarin sendi amtmanninum nakrar av hesum fiskunum og mælti til, at hesin fiskur varð vrakaður, líkamikið hvussu væl hann var framleiddur. Pløyen svaraði, at tað var ikki so gott uttan ávaring at nokta fyri at taka ímóti einari vøru, sum fólk høvdu virkað eftir ásetingunum. Tí álegði hann forvaltaranum at taka ímóti fiskinum, um einasta orsøk til at vraka hann var, at hann var ov rak. Pløyen helt, at hesin fiskurin skuldi goymast fyri seg, tí so var handilin førur fyri at meta um, hvussu nógvur fiskur var, og um tað var grundarlag fyri at gera broytingar í takstinum komandi ár[147]. 16. mars 1842 avgjørdi kongur gjøgnum Rentukamarið, at handilin skuldi taka ímóti sonevnda skinnfiskinum sum takstvøru, og at prísurin hetta árið skuldi vera 4 skillingar fyri pundið uttan mun til, hvat slag av turrum fiski, talan var um[148].

147 TSS. Færø Amt, Kopibók R, bræv nr. 98. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 15. november 1841.

148 TSS. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 1170. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannin dagfest 23. mars 1842.

### 11.2.2 Royna línuna

Nógva staðni hevði hesin summarfiskur givið høgligar møguleikar at royna at fiska við línu, og hesin nýggi mátin at fiska vísti seg at geva sera góða úrtøku. Besta prógvið uppá, at línufiskiskapurin gjørdi mun í 1841, var, at tað gjørdist ein almennur spurningur, um tíggjund skuldi latast av hesum fiskinum ella ikki.

Ein orsøk til, at Pløyen tók spurningin um tíggjund av línufiski upp, var, at fleiri eysturoyingar í 1841 fóru at fiska við línu heldur enn snøri, og tað fekk sýslumannin at spyrja, um tíggjund skuldi latast fyri línufisk á sama hátt sum fyri snørisfisk, tí higartil hevði almúgan ikki bjóðað sær til at gjørt tað. Pløyen svaraði, at tíggjund ikki skuldi latast, tí tað kundi eggja til at menna henda nýggja fiskiháttin, sum kundi fáa stóran týdning fyri landið, men hann tók fyrivarni fyri, at spurningurin skuldi leggjast fyri Kanselliið.

Pløyen bað um viðmerkingar frá prósti, fúta og sorinskrivara. Teir tríggir sóu onga orsøk til at siga, at hesin nýggju fiskihátturin skuldi sleppa undan tíggjund, og Pløyen ásannaði, at Norska lóg 2-22-2 og skriv frá Kansellinum frá 20. august 1833 ikki góvu møguleika fyri at gera undantøk. Hinvegin helt Pløyen, at tað, at deksfør ongantíð lótu tíggjund, sjálvt um tey fiskaðu við snøri á sama hátt sum bátarnir, var greitt tekin um, at vilji var til at stuðla hesi vinnu við at lata hana vera tíggjundafría. Higartil høvdu umstøðurnar gjørt, at lítið var komið burtur úr fiskaríi við deksførum, men um henda vinna kom fyri seg, so fór hon helst at verða tíggjundafrí, sjálvt um ásetingin í Norsku lóg var galdandi, tí nú var ein siðvenja íkomin. Tí helt Pløyen, at „den nye Fangstmaade med Langliner, der er aldeles forskjællig fra den sædvanlige, i det mindste kunde give Anledning til Tvivl“, og tí tók hann avgerðina.

Hann vónaði ikki, at Kanselliið tók tað illa upp, at hann hevði handlað soleiðis. Hann vísti á, at línufiskingin hevði givið góð úrslit, men hon avmarkaði seg higartil til „kystfiskeri“. Tað hevði júst í 1841 verið frálíkt, men tað hevði neyvan verið líka gott, um línur ikki vóru nýttar. Línurnar vórðu settar á botn og stóðu í 3 til 4 tímar uttan røkt ella ansing. Tá fóru tveir mans út at kanna, um nakað var komið á. Tað gjørdu teir einar tvær ferðir um dagin, og tað tók ein hálvan tíma hvørja ferð. Hesin veiðuháttur gav tí møguleika fyri, at menn kundu gera sítt arbeiði á landi, samstundis sum línan fiskaði. Tí var einki at ivast í, at línan kundi fáa ovurstóran týdning, og tí hevði hann loyvt sær at frítaka slíkan fisk frá tíggjund fyri at eggja til størri nýtslu.

Hann endaði brævið við at siga, at „enhver begunstigelse, om udbyttet blot er temporair, der maatte kunne tilstaaes eller udvirkes for Langline-Fiskeriet, efter min Overbevisning vil være en sand Velgjærning, sigtende til at fremme en begyndende, vigtig Industrie“[149]. Kanselliið samskifti við Rentukamarið um spurningin, og tað endaði við, at Kanselliið svaraði, at „overveiende Grunde“

149 TSS. Færø Amt, Kopibók T, bræv nr. 121. Bræv til Kanselliið dagfest 10. desember 1841.



*Samstundis sum betri prísur fekst á turrum fiski, bar eisini til at royna eftir landfiski við línu. Tilsamans kollveltu prísur, náttúra og tøkni soleiðis aldagamla føroyska útróðurin. (Mynd: Tjóðsavnið)*

talaðu fyri, at tíggjund skuldi latast av línufiski[150]. Sostatt vóru myndugleikarnir í Keypmannahavn ikki líka hugaðir at stuðla hesum nýggja møguleikanum, sum amtmaðurin í Føroyum var tað. Viðvíkjandi gongdini í málinum um fiskatíggjund verður annars víst til grein hjá Rolf Guttesen (Guttesen 2014).

### 11.2.3 Samband millum avreiðingar og prísir

Bæði í 1841 og í 1842 var nógvur fiskur at fáa, og áhugin av avreiða var uppaftur størri. Tað gjørdi, at pakkhúsini hjá Einahandlinum vóru á tremur. Fiskimenn fingu góðar inntøkur av øllum hesum fiskinum, og henda gongdin hevði eisini við sær, at ein skonnart varð send til Messina í Sikiloy við fiski, og sama ár varð turrur fiskur eisini útfluttur til Napoli. Hildið verður, at hetta kann vera upprunin til føroyskan fiskaútflutning til katólsku londini í Suðurevropa (Nolsøe og Jespersen 2009: 316).

Henda nógv økta avreiðingin økti um inntøkurnar í Føroyum, men fyri handilin var nógvi fiskurin eingin fyrimunur. Marknaðarprísurin fyri fisk var ikki góður, og tí roknaði handilin í 1842 við at hava eitt undirskot upp á 17.000 ríkisdálar av honum. Vánaligu marknaðarprísirnir merktu eisini, at takstprísurin á fiski fyri 1843 átti at fara langt niður. Handilsstjórnin ásannaði, at ein „saa

150 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 1196. Bræv frá Det Kongelige Danske Cancellie dagfest 29. mars 1842.

overordentlig betydelig Fluctuation i Prisen fra det ene Aar til det andet vilde blive alt for følelig for de Indvaanere, der have lagt sig efter Fiskeri, og kunde desuden lettlig foranledige en Standsning i denne for Færingerne meget vigtige Næringsvei." Tí lækkaði Handilsstjórnin ikki prísin so nógv, sum hon átti at gjørt, men kortini lækkaði prísurin á klippfiski úr 16 ríkisdálum og 64 skillingum fyri skippundið niður í 10 ríkisdálar, og prísurin á turrum fiski fór úr 6 skillingum fyri pundið niður í 4 skillingar aftur. Hevði marknaðurin rátt einsamallur, var prísurin farin uppaftur longri niður[151].

Ein annar trupulleiki hjá handlinum var, at nógvi fiskiskapurin gjørdi, at nógvur smáfiskur var í tí, sum varð sent niður at selja. Tað gjørdi tað neyðugt at skilja fiskin, so at handilin ikki fekk trupulleikar av smáfiskinum á marknaðinum. Tí avgjørdi Handilsstjórnin í 1845 at hava tveir ymiskar prísir á turrum fiski. Ein prísur var fyri fisk oman fyri ¾ alin, og ein var fyri fisk, sum var minni enn tað[152].

**Talva 11.1**




*Kelda: (Degn 1929: 138–140)*

Á talvu 11.1 omanfyri eru mongdirnar av turrum fiski, sum handilin flutti út hvørt ár frá 1820 til 1856, settar inn. Kurvarnar á talvuni eru prísirnir á ávikavist stórum ráskornum toski, lítlum ráskornum toski og longu. Talvan

151 SA. „1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland)". Resolutión af 1ste Marts 1843 um takst fyri árið 1843.

152 SA. „1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland)". Resolution af 26de Marts 1845 um takst fyri árið 1845.

vísir, at tað var ein týðiligur samanhangur millum vøksturin í avreiðingarprísi í 1840-41 og vøkstrinum í útfluttum mongdum. Harumframt sæst stórur munur á sambandinum millum prís og mongdir í 1830-árunum og 1840-árunum. Í 1830-árunum sær ikki út til, at mongdin av útfluttum fiski á nakran hátt ávirkaðist av prísbroytingum, meðan støðan var ein heilt onnur í 1840-árunum. Tá tykjast útflutningstølini at ávirkast nógv av prísbroytingum, og tað sæst m.a. aftur í 1843, tá ið prísurin var settur niður við einum triðingi, og í 1845, tá ið munur varð gjørdur á prísinum á stórum ráskornum toski og lítlum ráskornum toski. Í 1848 fór prísurin á bæði smáfiski og longu munandi upp, og sølutølini fylgdu við, og tað sama hendi hinvegin, tá ið prísurin árið eftir varð settur niður aftur. Í 1850-árunum vaks prísurin áhaldandi, og útflutningstølini fylgdu við. Samanhangurin millum vøruprísin og orkuna, sum varð løgd í at framleiða vøruna, er týðiligur eftir 1841. Tað er ein staðfesting av, at tað ikki longur bara var tað, sum leyp av, sum varð selt til handilin. Nú var turrur fiskur vorðin ein týðandi vinna.

## *11.3 Samandráttur*

Trýst frá Pløyen amtmanni og høgligir konjunkturar gjørdu, at Handilsstjórnin í 1841 avgjørdi at hækka prísin á fiski, sum varð seldur til Einahandilin. Heppið samanfall gjørdi, at henda príshækkingin hendi, júst um sama mundið, sum nógvur fiskur var at fáa inni við land, og menn høvdu áhuga í at royna nýggju tøknina, sum var komin úr Hetlandi. Hesi viðurskiftini gjørdu, at mongdin av avreiddum turrum fiski vaks í stórum, og brádligi vøksturin gav fólki vónir um, at fiskivinna kundi fáa størri týdning sum inntøkugrundarlag, og at tað harvið fór at bera til at tryggja sær í hvussu er partar av inntøkuni uttan fyri gomlu vinnuskipanina, sum var bygd á landbúnaðin.

Ein avmarking í hesari vinnuni við turrum fiski var, at fiskur bara kundi turkast um várið, og tí var tørvur á øðrum arbeiðsmøguleikum restina av árinum. Tí var møguleikin at avreiða ráfisk til klippfiskaframleiðslu um summarið kærkomin hjá teimum, sum longu høvdu roynt at lagt seg eftir at liva av útróðri, og fyri komandi klippfiskaframleiðsluna var tað eisini ein fyrimunur, at hesin bólkur var til reiðar at gagnnýta nýggju møguleikarnar. Tí ber eisini til at siga, at møguleikarnir, sum komu í 1841, gjørdu sítt til, at nøkur fólk brutu karmarnar kring tað gamla støðuga bóndasamfelagið, og tað vóru serliga hesi fólkini, sum vóru til reiðar, tá ið enn fleiri møguleikar komu.

Soleiðis gjørdist vinnuligur útróður við framleiðslu av turrum fiski ein týdningarmikil liður í gongdini fram móti einum modernaðum fiskivinnusamfelag, sum var bygt á framleiðslu av klippfiski. Tá ið fríhandilin kom, vóru allar avmarkingar í fiskaframleiðslu tiknar burtur, og tað merkti m.a., at nýggju handlarnir kundu framleiða klippfisk alt árið. Tað var helst orsøkin til, at útflutningurin av turrum

fiski fór at minka í fríhandilstíðini. Restina av 19. øld minkaðu nøgdirnar av turrum fiski alla tíðina so líðandi, og móti endanum á øldini varð so at siga eingin turrur fiskur útfluttur longur (Patursson 1961a: 57). Skiftistíðin við útróðri og turrum fiski var liðug. Tað var klippfiskurin, sum var grundarlagið undir framvøkstrinum av føroyskari fiskivinnu, og tað er tí serliga søgan um ta framleiðsluna, sum dentur verður lagdur á restina av hesari ritgerðini.

# 12. kapittul
# Nevnd mælir til fullkomnan fríhandil

Uppskotini hjá Pløyen amtmanni og øll tann órógvin, sum var viðvíkjandi Einahandlinum í Føroyum, gjørdi helst sítt til, at spurningurin um føroysku handilsviðurskiftini í 1840 enn eina ferð gjørdust partur av eini stórari nevndarviðgerð. Hesa ferð var tað ein nevnd, sum í fimm ár hevði viðgjørt ymisk grønlendsk viðurskifti, sum eisini fekk til uppgávu at viðgera, hvat tað rætta var at gera viðvíkjandi føroyska handlinum.

## 12.1 Nevndin

Henda nevndin var upprunaliga eitt úrslit av nógva kjakinum um einaveldið og stovnarnar undir tí í 1830-árunum. Ein av stovnunum hjá kongi var Kongligi Grønlendski handilin, sum embætismenn komu við uppskotum um at broyta. Ein av hesum embætismonnum var kaptein Graah, sum var limur í Handilsstjórnini, og sum eisini var tann fyrsti handilsstjórnarlimurin, sum vitjaði Føroyar. Eftir nakað væl av kjaki um grønlendsku viðurskiftini endaði tað við, at Rentukamarið 16. apríl 1835 valdi at seta eina nevnd at arbeiða við málinum, at „Undersøge hvorvidt der kunne åbnes for en mere Udstrakt Frihandel på Grønland".

Í nevndini sótu Jonas Collin, sum var formaður, og Christian Lund, sum umboðaðu Rentukamarið, Niels Giessing Wolf, professari, og Christian Pingel, doktari, sum vóru serkønir í grønlendskum viðurskiftum, etatsráð Giede og kapteinarnir Graah og Holbøll umboðaðu Handilsstjórnina, etatsráð Hvidt og grosserarnir Mathias Wilhelm Sass og Andreas Hansen umboðaðu frælsu handilsstættina í Keypmannahavn. At enda var Torkild Abraham Hoppe limur í nevndini. Hann hevði verið limur í Handilsstjórnini og knýttur at Rentukamarinum, men í 1841 varð hann útnevndur til stiftamtmann í Íslandi.

Nevndin arbeiddi við grønlendskum spurningum í seks ár, og fleiri av hugskotunum hjá nevndini vórðu sett í verk, meðan hon var virkin. Stóri spurningurin var kortini spurningurin um einahandil ella fríhandil, og í tí sambandinum varð bæði umrøtt at selja Grønland, at leiga handilin út og at gera hann frælsan. Kjakið um hesar spurningar gekk aftur og fram, tá ið tíðindini frættust um, at P.J. Kall, sum umboð fyri handilshúsið von der Pahlen í Frederikshavn, hevði misbrúkt sítt loyvi at reka hvalaveiðu o.a. frá einari støð í Holsteinsborg. Kall hevði lagt støðina í Napassoq sunnanfyri Sukurtoppin, og í nøkur ár misbrúkti

*Jonas Collin var formaður í nevndini, sum viðgjørdi spurningin um føroyska handilin í 1840-42. Hann hevði sum embætismaður stóra ávirkan síðstu árini við einaveldi. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



hann grønlendingar grovliga í virksemi sínum, men átakið var eisini so illa umsitið, at øll ætlanin datt niðurfyri aftur í 1841. Hesar vánaligu royndirnar av frælsa vinnulívinum gjørdu, at nevndarlimirnir sleptu hugsanini um frían handil í Grønlandi. Tí avgjørdi nevndin at mæla til, at einahandilin helt fram. Tvey av umboðunum fyri fríu handilsstættina í Keypmannahavn vóru ímóti, men tilmælið frá nevndini varð endaliga staðfest 6. mars 1844 (Gad 1984: 216–217).

Henda sama nevndin fekk 14. apríl 1840 til arbeiðssetning at kanna, „hvorvidt, og i bekræftende Fald, under hvilke Betingelser en mere eller mindre udstrakt Frihandel kunde aabnes med Hensyn til Færøerne“. Tá varð nevndin víðkað við Pløyen og Hunderup, sum komu inn sum serkønir í føroyskum viðurskiftum.

## *12.2 Álit nevndarinnar um føroyska handilin*

Nevndin var liðug við arbeiði sítt 25. apríl 1842, og hon var púra samd um, at púra fríur handil skuldi innførast í Føroyum. Í álitinum greiddi nevndin frá teimum nevndararbeiðunum, sum áður høvdu verið um sama spurning í 1821 og 1835, og hon ásannaði, at higartil var fríhandilin ikki vorðin til veruleika, tí ymisk atlit higartil høvdu gjørt, at avgerðin ikki var tikin.



*Christian Lund var millum fremstu embætismenn í Rentukamarinum. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

**12.2.1 Fyrivarni hjá undanfarnum nevndum**

Atlitini vóru, at einahandil hevði verið í Føroyum í øldir, og tí høvdu føroyingar ikki tann kunnleika og tey evnini, sum skuldu til at reka frían handil. Føroyski marknaðurin var eisini so lítil, at ein einstøk fyritøku lættliga megnaði at reka allan handilin, og tí var vandin stórur fyri, at kongsins monopol bara varð útskift við eitt privat monopol, og tað var nógv skaðiligari enn tað almenna monopolið. Avmarkaða støddin gjørdi eisini, at fólk óttaðust fyri, at vørumangul kundi íkoma serliga av korni, og tað kundi enda við hungursneyð.

Sjálvt um hesi atlit høvdu gjørt, at avgerðin um at innføra frían handil ikki var tikin enn, so var hugsanin um, at fríhandil var tað rætta, ongantíð slept, og nevndirnar vóru komnar til, at tað rætta at gera var, at „man ved passende Forberedelse burde søge at nærme sig dette Maal." Tað skuldi millum annað gerast við at „forøge dets Production saaledes, at Producternes Omsætning i Tiden kunde blive gjenstand for Speculation af flere Handelsmænd." Greitt er frá fleiri av hesum átøkum í kapitli 4.14.

Í 30-árunum vóru góðar tíðir, fólk fingu betri fíggjarstøðu, og yvirskotið í handlinum vaks. Tí varð enn ein nevnd sett, men hon kom við enn einum fyrivarni. Tað var, at tað var ikki ráðiligt at innføra frían handil, „saalænge Beboernes Culturtilstand og Landets Production ei var bragte paa et høiere Trin." Tí mælti eisini hon til at gera fyrireikingar til fríhandil. Greitt er frá hesum nevndararbeiðinum í kapitli 7.4.

### 12.2.2 Fyrimunir við fríum handli

Í áliti sínum byrjaði nevndin við at greiða frá fyrimununum við fríum handli. Har hugsaði hon fyrst og fremst um føroyska fólkið, tí „skjøndt det aldeles ikke kan henregnes blandt uciviliserede, dog ikke har kunnet tilegne sig Resultatet af den øvrige civiliserede Verdens Fremskriden i Cultur, uagtet Alle ere enige i, at Færingerne ere livlige, lærvillige og af Naturen velbegavede.“ Orsøkin var, at ein patriarkalsk skipan sum Einahandilin hevði skaðiliga ávirkan á menningina av fólkinum. „Den vil altid holde dem i en vis Umyndighedstilstand, og da dens Kræfter ingen Anledning erholde til selvstændigen at udvikle sig, efterhaanden gjøre dem mere og mere uskikkede til at modtage de Goder, som en høiere Civilisation fører med sig, og som største Delen begrundes paa nærmere Samqvem med mere dannede Mennesker.“ Við øðrum orðum gjørdi Einahandilin, at føroyingar als ikki megnaðu at fylgja við í menningini og tí vórðu longri og longri afturúrsigldir. Ein týðandi fyrimunur við fríhandli var, at henda gongdin kundi vendast.

Vinnuliga ásannaði nevndin, at landbúnaðurin neyvan nakrantíð fór at fáa stóran týdning í føroyska handilinum, tí landið lá so norðarliga. Seyðahald var týdningarmiklasta vinnan, og har kundi meira fingist burturúr við ymiskum átøkum, sum t.d. at byggja seyðahús og at avtaka „det nuværende fordærvelige Fællesskab“. Nevndin slepti soleiðis øllum teimum fysiokratisku hugsanunum, sum fingu so stóra ávirkan síðstu áratíggjuni av 18. øld.

Heldur enn at menna nakran landbúnað, fór stóri vinnuligi fyrimunurin við fríum handli at verða, at fiskivinnan „vilde saaledes under en Frihandel upaatvivleligen blive drevne af de Handlende, som have Etablissementer i Landet, med langt mere Kraft og afbenyttede med langt større Fordele end hidtil under Monopolet har været Tilfældet.“ Eisini henda nevndin vísti til fiskiskapin hjá útlendskum skipum serliga á bankunum vestanfyri, og niðurstøðan var greið: „Der er altsaa god Grund til at antage, at et Fiskeri drevet fra Landet med Dæksfartøier, efterhaanden vil kunne komme istand og under en Frihandel blive en ny, ikke uvigtig Indtægtskilde saavel for Landets egne Beboere som for deres Majestæts øvrige Undersaatter.“ Ivamál hevði verið, um til bar at framleiða saltfiskin til klippfisk, tí verjutollur gjørdi, at tað var so torført at selja saltfiskin til Fraklands, men Pløyen, Graah og Hunderup vissaðu nevndina um, at klippfiskur, sum var framleiddur í Føroyum, var minst lík so góður sum tann íslendski.

### 12.2.3 Vansar við fríum handli

Síðani fór nevndin undir at siga sína hugsan um teir vansarnar við fríhandli, sum gjøgnum árini høvdu verið frammi. Her ásannaði nevndin, at tað sjálvandi ikki fór at vera nakar føroyingur, sum stóð klárur at taka við sum keypmaður, entreprenørur ella skipari, tann dagin Einahandilin varð avtikin, men tað var heldur ikki neyðugt, tí hesir kunnleikar kundu koma uttaneftir, og føroyingar fóru skjótt at læra av teimum.



*Christian Pingel var geologur og hevði gjørt ymiskar vísindaligar kanningar í Grønlandi. Hann var limur í nevndini sum serkønur í grønlendskum viðurskiftum. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Fyrivarnið við, at føroyingar vóru minni mentaðir enn aðrar tjóðir, har fríhandil hevði verið í langa tíð, helt nevndin heldur ikki nógv um, tí sambært embætismonnunum í Føroyum vóru føroyingar sum heild væl upplýstir, og teir „staae i mange Henseender over den danske Almue og ere af Naturen et opvakt og lærvilligt Folk, saa at de snart vilde lære at bevæge sig i de nye Sphærer, som de friere Forhold maatte frembyde.“ Henda orðingin var nógv brúkt komandi árini, tá ið spurningurin um fríhandilin var til viðgerðar, og tað man ikki vera langt av leið at halda, at tað var Pløyen amtmaður, sum hevði sagt hetta á nevndarfundi. Subjektiva metingin av, at føroyingar enn ikki vóru nóg siviliseraðir til at kunna gagnnýta møguleikarnar í einum modernaðum heimi, hevði í langa tíð verið annað beinið í javnvágsfelluni, tí hon merkti, at fólkið skuldi fyrireikast til nýggju tíðina. Fekst undirtøku fyri metingini hjá nevndini um, at føroyska almúgan var minst líka so mentað, sum tann danska almúgan var, merkti tað í veruleikanum, at staturin onga orsøk longur hevði til at fyrireika føroyingar, og ongin orsøk var heldur til at bíða við fríhandlinum, til fyrireikingarnar vóru komnar á mál.

Av øðrum vansum helt nevndin, at lítið var at óttast fyri, at føroyski marknaðurin var ov lítil, tí fríhandilin fór júst at økja um framleiðsluna í landinum, og serliga ein ment fiskivinna fór at hava stóran vøkstur við sær. Knýtt at hesi atfinning var hugsanin um, at arbeiðsmegin í Føroyum var ov lítil. Tað kundi hava við sær, at um stórur dentur varð lagdur á fiskivinnu, so fór fólk at vanta í landbúnaðinum og umvent, men eisini her helt nevndin, at fríhandilin var loysnin, tí fólkatalið fór ikki at vaksa skjótari, fyrr enn vinnulívið gav møguleika fyri tí. Nevndin skrivaði, at „der kan derfor ingen Tvivl være om, at Folkemængden efterhaanden vil tiltage i samme Forhold som Adgangen til Erhverv under friere

*Niels Giede umboðaði Handilsstjórnina í nevndini, sum viðgjørdi føroyska handilin. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



Forhold bliver lettere og Udsigten til Fortjeneste sikkrere.“ Nevndin væntaði eisini, at eitt ment vinnulív fór at hava við sær, at fólk gjørdust meira spesialiserað, og á tann hátt slapst undan vansanum við, at føroyingar samstundis vóru bæði bøndur, fiskimenn, timburmenn, smiðir, bátasmiðir o.s.fr. Henda gongdin sást aftur í øllum londum, sum fluttu seg frá einari lítið á leið komnari støðu til eitt meira ment samfelag. Kapitalistiski búskapurin fór sjálvur at taka sær av øllum hesum vansunum, sum kundu koma í kjalarvørrinum á honum.

Síðsti vansin, sum nevndin tók fram, var, at statskassin fór at missa ta inntøku, sum hann hevði havt í yvirskotinum hjá handlinum. Higartil høvdu oyggjarnar so at siga einki annað givið til statskassan, men um eitt avgjald varð lagt á skip, so minkaði tað nakað um tapið hjá statskassanum. Niðurstøðan hjá nevndini hesum viðvíkjandi var kortini, at hesin kostnaðurin hjá statskassanum ikki skuldi forða fyri at gera tað rætta fyri føroyingar. Hetta var ein nýggjur spurningur, sum ikki hevði verið so nógv frammi fyrr, men hann kom at fylla nógv í viðgerðini av, hvussu Einahandilin í Føroyum skuldi avtakast.

**12.2.4 Niðurstøðan greið**

Tá ið nevndin var liðug at greiða frá fyrimunum og vansum við fríhandli, var roknistykkið greitt, og nevndin tók saman um við at siga: „Da nu Betænkelighederne ved Handelsens Frigivelse, efter det Foranførte ikke synes at være af nogen stor Betydenhed, Fordelene ved en Frihandel derimod at være indlysende, saa maa Commissionen erklære sig for den Mening, at den færøske Handel bør frigives.“

So var spurningurin, um fríhandilin skuldi fyrireikast í eina tíð ella setast í gildi skjótast møguligt. Eisini her var nevndin púra greið, tá ið hon segði, at

> Commissionen kan ikke dele den Anskuelse, som tidligere gjentagende er bleven



*Carl Peter Holbøll hevði verið inspektørur í Suðurgrønlandi frá 1828, so hann var kønur í grønlendskum viðurskiftum. Í nevndini umboðaði hann Handilsstjórnina. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

udtalt, at visse særegne Foranstaltninger, sigtende til at forberede Frihandelen skulde være nødvendige, og Tidspunctet for Frigivelsen altsaa udsættes indtil disse Forberedelser er blevne iværksatte. Man har nemlig forhen staaet i den Formening, at det, forinden Handelen blev frigivet, vilde være nødvendigt at bibringe Beboerne en vis Dygtighed til selv at overtage og drive Handelen og at iværksætte saadanne Forbedringer og Udvidelser ved Næringsveiene, at der fra disse kunde haves en tilstrækkelig Mængde af Producter til Handelsomsætning.

Og at nevndin noyddist at

Betvivle Muligheden af, ved Forberedelser under et Monopol at bevirke en saadan Forbedring i Beboernes og Landets Tilstand, som den tilsigtede. Den Dygtighed, sum savnes hos Beboerne, erhverves kun i Erfaringens egen Skole; kun ved at leve og virke under friere Forhold, ved at færdes med og blandt Andre, der have naaet en høiere Civilisation, bliver Dannelsen af en Middelstand blandt Beboerne muelig, og det er fra denne, at Handelsmænd, Entreprænører for Industrielle Foretagender o.s.v. skulle udgaae. At der bør gives Beboerne enhver mulig Adgang til at erholde de for en dygtig Middelstand nødvendige Kundskaber, fx ved at sørge for passende Dannelsesanstalter i Landet, er en anden Sag, men slige Foranstaltninger behøve ikke at gaae forud for Handelens Frigivelse.



*Lauritz Nicolai Hvidt umboðaði handilsstættina í Keypmannahavn, og hann var eisini tjóðbankastjóri. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Sostatt trúði nevndin ikki uppá tann politikkin, sum higartil hevði verið førdur, har roynt varð, serliga við ymiskum fiskivinnuátøkum, at ala fram eina miðalstætt, sum kundi taka við, har Einahandilin slepti. Ein slík stætt kundi, sambært nevndini, bara taka seg fram undir frælsum handli. Tí kundi hon heldur ikki taka undir við uppskotinum hjá Pløyen frá februar 1839 um at lata allan handil, sum hevði við fiskivinnu at gera, vera frían undir liðini á Einahandlinum. Tað var bara við einum „almindelig Frigivelse af Handelen at Fiskerierne i det Store ville kunne trives og lykkes fuldstændigen.“

Báðir Tillisch brøðurnir, sum høvdu verið amtmenn undan Pløyen, vóru eisini spurdir um uppskot Pløyens, og teir ivaðust báðir í, um nakað var at vinna við hesum uppskotinum. Báðir hildu sum nevndin, at tað var rættari at avtaka Einahandilin, um fiskivinnan skuldi mennast. Annar av teimum helt kortini, at tað var umráðandi at hoyra, hvat føroyingar hildu um spurningin, men tí tók nevndin als ikki undir við, tí føroyingar kundu, sum støðan var, ikki hava „fuldstændig Indsigt“, og tí kundu teir heldur ikki hava nakra „rigtig Mening“ um málið. Undir nevndararbeiðinum fór Pløyen eisini burtur frá sínum egna uppskoti, og tað var helst ikki so løgið, tá ið nevndin tók eina radikalari støðu, enn Pløyen í uppskoti sínum hevði lagt fram.

### 12.2.5 Fríur fyri øll ella bara fyri danskar borgarar

Nevndin kom fram til, at fríur handil skuldi innførast í Føroyum, og tað gav onga meining at brúka tíð upp á at fyrireika føroyingar til hann. Eftir var bara spurningurin um, hvussu handilin skuldi leysgevast. Her umrøddi nevndin



*Mathias Wilhelm Sass hevði eina stóra fyritøku, sum rak samhandil við onnur lond. Eina tíð átti hann millum 20 og 30 skip, sum fluttu vørur til og frá Keypmannahavn, og tá var fyritøka hansara ein av teimum ríkastu í býnum. Í nevndararbeiðinum óttaðist hann fyri, at útlendingar skuldu fara avstað við føroyska handlinum, um handilin varð gjørdur púra fríur fyri øll, sum restin av nevndini ætlaði. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

møguleikan at skipa handilin á sama hátt, sum íslendski handilin hevði verið skipaður, men meginparturin av nevndini helt ikki, at tað var ein gongd leið. Tað rætta var at gera handilin púra frælsan fyri allar tjóðir. Major Sass, sum umboðaði handilsstættina í Keypmannahavn, var ósamdur, tí hann óttaðist fyri, at ein púra fríur handil fór at merkja, at fremmandir fóru avstað við øllum føroyska handlinum. Hesum óttaðist meirilutin í nevndini als ikki fyri, tí føroyingar fóru framvegis at hava tørv á donskum korni og øðrum vørum, og tí var longu eitt natúrligt handilssamband knýtt millum londini, sum „Intet vil kunne forstyrre".

Meginreglan, sum meirilutin í nevndini fylgdi, hvussu hon hugsaði sær at skipa handilin, gjørdist: „Den størst mulige Frihed i enhver Næringsdrift og ingen Indskrænkninger eller Baand, uden forsaavidt Samfundsvellet i Almindelighed eller Beboernes Vel i Særdeleshed maatte fordre det." Tí helt nevndin eisini, at handilin átti at gerast frælsur fyri allar fremmandar tjóðir. Stórir fyrimunir fóru at verða av hesum frælsinum, tí Føroyar lógu so tætt at Hetlandi, at nógvir fyrimunir kundu fáast í samhandli við Bretland. Harumframt fóru forðingar í fríhandlinum at gera vandan fyri vørumangli, og at eitt nýtt monopol fór at taka seg upp, størri. Øll, sum búðu ella ætlaðu sær at búgva í Føroyum, skuldu hava rætt til at handla, og eingin munur átti at verða gjørdur á, um hann var fremmandur, danskur ella innføddur. Rætturin at handla skuldi heldur ikki avmarkast til ávís støð, men ein og hvør skuldi kunna handla, har hann helt tað vera best fyri seg. Øll skip, donsk ella fremmand, skuldi tí eisini sleppa av við vørur sínar har og til tann, sum tað helt vera best.

*Andreas Nicolai Hansen umboðaði handilsstættina í nevndini. Hann arbeiddi í mong ár fyri Joseph Hambro, men yvirtók í 1840 stóru ídnaðarvirki hansara á Christianshavn. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



Hetta víðgongda frælsið var í meira lagi fyri umboð fyri donsk handilsáhugamál, og tí helt major Sass, at ein avmarking skuldi gerast, so at fremmand skip bara fingu loyvi til at selja til “de faste Kjøbmænd“, tí tað fór at skaða teirra virksemi, um skipini kundu selja, har tey høvdu hug til. Restin av nevndini hevði ikki hesa hugsan, og teir hildu heldur ikki, at teir føstu handlandi høvdu tørv á nakrari slíkari verju.

Nevndin óttaðist ikki fyri, at kornmangul fór at taka seg upp í Føroyum, tí tað var lítið hugsandi, at frælsir keypmenn fóru at hava ov lítið av landsins týdningarmiklastu innflutningsvøru á goymslu, og við fríum samskifti var skjótt at seta seg í samband við umheimin umvegis Hetland. Tí tók nevndin ikki undir við uppskotinum um, at kongur skuldi hava eina korngoymslu í landinum. Hon vildi tó geva seg so mikið, at tað kundi gerast eitt krav hjá teimum, sum keyptu tey fýra verandi handilsstøðini, at teir fýra tey fyrstu árini fingu álagt, at teir skuldu veita trygd fyri, at nóg mikið av korni var at fáa til keyps.

### 12.2.6 Inntøkur statsins

Ein tann torførasti spurningurin hjá nevndini var, hvussu statskassin kundi fáa nakrar inntøkur í staðin fyri vinningin, sum hann misti, tá ið Einahandilin varð niðurlagdur. Her ásannaði nevndin, at tað fór at verða sera torført at stovna ein tollstovn, og tí var neyðugt at finna aðrar og einfaldari skipanir at fáa inntøkur til vega. Tí var nevndin komin fram til, at lættasti mátin var á áleggja eitt lastgjald á øll skip, sum komu til og fóru úr Føroyum. Í hesari skipanini skuldi atlit bara takast til støddina á skipinum, og ikki hvat virðið var á vøruni umborð. Nevndin

ásannaði, at henda skipan fór at raka bíligar vørur harðari enn dýrar vørur, men soleiðis mátti tað vera, tá ið eingin stovnur var at taka sær av tolli. Nevndin vildi helst, at henda „Beseilingsafgift" var líka stór á øllum donskum skipum, um tey so fluttu føroyskar vørur til Danmarkar ella uttanlands, men hon ásannaði eisini, at fyriskipanin frá 13. august 1790 gjørdi hetta ógjørligt, tí sambært henni skuldi 1 % leggjast oman á vørur, sum vórðu fluttar út í heim.

Inntøkurnar av hesi avgjaldsskipan skuldu helst svara til tað tap, sum kongur hevði av at avtaka Einahandilin, men tað fór at verða torført, so leingi sum framleiðslan í Føroyum var so lítil, sum hon var. Avgjaldið skuldi helst ikki vera so høgt, at orsøk var til at klaga um tað, og tað skuldi undir øllum umstøðum ikki vera so høgt, at tað oyðilegði endamálið við at gera handilin í Føroyum frælsan. Nevndin helt, at føroyingar áttu at goldið nøkulunda líka nógv, sum danir guldu í innflutningstolli. Tí roknaði hon seg fram til, at føroyingar áttu at gjalda 8-9% av teimum 30.000 ríkisdálunum, sum árligi innflutningurin hevði verið síðstu árini. Tað svaraði til millum 2700-3000 ríkisdálar. Samlaði lastakapasiteturin á skipunum, sum fluttu vøru til og úr Føroyum var 600 til 700 kommersulestir, so um avgjaldið var 5 ríkisdálar fyri hvørja kommersulest, so var málið væl og virðiliga rokkið. Donsk skip, sum fluttu føroyskar vørur til Danmarkar, skuldu kortini bara gjalda 3½ ríkisdála fyri hvørja kommersulest, meðan skip, ið komu frá londum, har stórur tollur varð lagdur á fisk, sum ikki varð innfluttur á teirra egnu skipum, skuldu gjalda 10 ríkisdálar fyri hvørja kommersulest. Aftur her royndu umboð fyri donsk handilsáhugamál at vinna sínum ein fyrimun, tá ið Andreas Hansen skeyt upp, at fremmand skip skuldu gjalda 15 ríkisdálar fyri hvørja kommersulest. At enda avgjørdi nevndin at skjóta upp, at donsk skip skuldu kunna avgreiðast í teimum fýra støðunum, har handil nú var, men fremmand skip skuldu fyrst inn á Havnina, tí tað var ikki víst, at fólk var í hinum støðunum, sum var ført fyri at lesa skipsskjøl á fremmandum máli.

### 12.2.7 Fiskivinna skuldi framvegis stuðlast

Síðsti spurningurin hjá nevndini var, um tað almenna skuldi stuðla vinnuni, eftir at fríhandilin var komin. Tað helt nevndin lítið um, tí tað var so skjótt, at slík uppíblanding gjørdi størri skaða enn gagn. „Vi formene derfor, det vil være rigtigt, fra Begyndelsen af at overlade Næringsveiene til frit at udvikle sig saaledes, som de ifølge de naturlige Forhold bedst kunne." Eitt undantak var kortini, og tað var spurningurin um at fáa deksfør til fiskivinnuna. Á tí økinum helt nevndin, at

> Opmuntringer hertil i et bestemt Tidsrum for at komme Fiskeriet, i Særdeleshed til Torskefiskeriernes drift i det Store, ville formeentligen være vel anvendte, da samtlige naturlige Forhold ikke kunne efterlade nogen Tvivl om, at denne Næringsvei i Tiden jo maa og vil blive en af Landets vigtigste, og da der paa Øerne selv ei findes den fornødne Capital, og denne, om den end fandtes, ei vilde kunne undværes uden Skade for Landbruget og Faareavlen. At de hidtil i denne Retning udleverede Præmier og Understøttelser Intet have kunnet

*Torkild Hoppe hevði verið skrivari í nevndini, sum í 1834 skuldi gera eitt lógaruppskot um íslendska handilin. Hann var í 1835 útnevndur til nevndina, sum skuldi viðgera grønlendska handilin, og samstundis gjørdist hann revisor fyri føroyska og grønlendska handilin. Í 1837 gjørdist hann limur í Handilsstjórnini, og 1841 varð hann útnevndur til stiftamtmann í Íslandi. Í 1848 gjørdist hann amtmaður í Sorø amti.*
*(Mynd: Kongliga bókasavnið)*



> udrette, kan næppe bevise Noget herimod, da dette mindre gunstige Resultat upaatvivleligen maa tilskrives det stedfindende Monopol.

Tí mælti nevndin til at endurnýggja stuðulsskipanina frá 1821 og lánimøguleikan frá 1836.

Nevndin helt, at skiftistíðin ikki nýttist at vera so long, tí teir, sum keyptu verandi handlar, fingu bæði handilshøli og vørugoymslu beinanvegin og kundu tí byrja sama dag, sum teir fingu ognirnar. Kortini helt nevndin, at tvey ár skuldu ganga, frá tí kongur kunngjørdi avtøkuna av Einahandlinum, til handilin fór endaliga í søguna. Ein av nevndarlimunum helt, at skiftistíðin átti at vera trý ár, og tí kom endaliga avgerðin at ljóða, at handilin skuldi gerast frælsur eftir 2-3 ár.

Tá ið nevndin undirskrivaði álit sítt, vóru Pløyen og Hunderup langt síðani farnir aftur til Føroya, og heldur ikki íslendski stiftamtmaðurin Hoppe var til staðar at skriva undir. Teir høvdu kortini fyrr boðað frá, at teir tóku undir við øllum týdningarmiklum lutum í álitinum, so tað var ein samd nevnd, sum undirskrivaði álitið við undantaki av teimum viðmerkingunum, sum major Sass hevði havt.[153]

153 SA. Kongehuset. Frederik 7., konge, sager vedr. Færøerne 1844-45. Øll henda gjøgnumgongdin byggir á álitið frá nevndini at viðgera føroyska og grønlendska handilin dagfest 25. apríl 1842. Her er avrit í „Sager betræffende den intenderede Frihandel paa Færøerne“.



*Kristian 8. kongur vildi ikki taka niðurstøðu nevndarinnar til eftirtektar og avtaka Einahandilin í Føroyum. Í dagbók sína skrivaði hann hvítusunnudag í 1844, at hann á ríðitúri sínum henda dagin hevði hitt tveir føroyingar, og teir søgdu seg vera nøgdar við Kongliga handilin og óttast fyri avleiðingunum, um handilin varð avtikin.*
*(Mynd: Kongliga bókasavnið)*

## *12.3 Kongur og Rentukamarið ivast*

Sjálvt um henda stóra nevndin var so at siga einmælt samd um tilmæli sítt, so kom heldur eingin fríhandil á hesum sinni. Høvuðsorsøkin var helst, at Rentukamarið mælti kongi frá at innføra fríhandil. Tí avgjørdi kongur, at Rentukamarið skuldi koma við einari frágreiðing um, hvussu handilin kundi avtakast, sjálvt um hann ikki enn hevði avgjørt, um hann skuldi avtakast[154].

Torført er at siga nakað neyvt um, hvussu arbeitt varð víðari við tilmælinum hjá nevndini, men ein ábending er um, at í hvussu er Pløyen amtmaður var vónbrotin av móttøkuni, sum álitið fekk. Í hvussu er søkti Pløyen um eitt annað amtmansembæti um ársskiftið 1842/43. Tað var starvið sum amtmaður í Thisted amti. Pløyen varð innstillaður sum nummar trý, men Rentukamarið avgjørdi 2. februar 1843 at seta tann, sum var innstillaður sum nummar fýra, í starv (Pedersen 1998: 415).

Á vári 1844 var Rentukamarið klárt at leggja síni tilmæli fram fyri kong og Statsráðið um, hvat gerast skuldi við tilmælini hjá nevndini. Spurningurin um grønlendska handilin varð lagdur fyri Statsráðið 6. mars 1844, og har varð mælt til, at handilin ikki skuldi gerast fríur, men grønlendingar skuldu fáa betri prís fyri sínar vørur, serliga fyri kópaspik (Christian 1995a: 439).

154 Rigsdagstidende 1850-51, sp. 6726.

*Hosutakarin Niels Skaale var í Keypmannahavn í 1844. Christian Ludvig Tillisch, sum var kabinetskrivari hjá kongi bað hann fara at práta við krúnprinsin, áðrenn krúnsprinsurin fór til Føroya. V.U. Hammershaimb vísti Nielsi og D.J. Joensen vegin til Christiansborg slott, og har greiddu teir krúnprisinum frá, at føroyingar sum heild vóru væl nøgdir við handilin nú, tí hann hevði verið væl stýrdur síðstu tíðina. (Mynd: Tjóðsavnið 4443F067)*



Kristian 8. kongur hevði stóran áhuga í spurninginum um Kongliga handilin í Føroyum, og 18. mars 1844 slapp Muhle, bókhaldari í handlinum, at greiða kongi frá teimum sjónarmiðum, sum hann hevði prentað í bók síni (Christian 1995a: 446). Fáar dagar seinni avgjørdi kongur, at ætlaða Føroyaferðin hjá krúnprinsinum skuldi bíða nakrar vikur (Christian 1995a: 454), og hugsandi er, at kongur vildi hava eina greiðari mynd av møguleikunum viðvíkjandi føroyska handlinum, áðrenn krúnprinsurin fór avstað.

Kristian kongur fór ein ríðitúr gjøgnum Aldershvile og Frederiksdal annan hvítusunnudag 27. apríl 1844. Á túrinum møtti hann tveimum føroyingum, sum hann fór at práta við. Teir søgdu seg vera nøgdar við handilin, soleiðis sum hann varð rikin nú, og teir vóru bangnir fyri, at fríhandil fór at enda við, at teir komu í klørnar á einstøkum keypmonnum (Christian 1995a: 480).

Hosutakarin við Kongliga handilin, Niels Skaale, var í Keypmannahavn í 1844, og hann helt, at ein orsøk til, at krúnprinsurin vildi sleppa at vitja í Føroyum, var, at kongur hevði havt so nógv við Kongliga handilin at gera. Prinsurin spurdi tí Niels, hvat føroyingar hildu um handilin, og Niels hevði svarað honum, at nú



*Nýggju fregattirnar Gefion og Thetis skuldu føra krúnprinsin til Føroya, og 23. mai fylgdu kongur og drotningin við, tá ið krúnprinsurin fór avstað. (Mynd: Danmarks Nationalmuseum)*

vóru flestir føroyingar fyri, at Einahandilin skuldi halda fram, tí hann hevði verið stýrdur væl síðstu tíðina (Nolsøe og Jespersen 2009: 310). Kanska var misnøgdin ikki tann sama í 1844, sum hon hevði verið fá ár frammanundan, og tað kann hava ávirkað støðutakanina hjá kongi.

Júst hvørja ávirkan hesar samrøður við nøgdar føroyingar høvdu, er ógjørligt at siga, men tveir dagar eftir samrøðuna á ríðitúrinum, tann 29. apríl, avgjørdi kongur í samráð við Zahrtmann, at krúnprinsurin skuldi fara við fregattunum Gefion og Thetis, at teir skuldu fara til Skotlands, og heim aftur úr Føroyum skuldi prinsurin fara við kadettkorvettini. Longu sama dag fekk kamarharrin Captain Bille boð um, at hann skuldi vera til reiðar at taka krúnprinsin við úr Føroyum aftur (Christian 1995a: 468–469). 23. mai fór kongur til Charlottenlund við Ræder kapteyni, og har sá hann krúnprinsin fara umborð klokkan 12, og Gefion fór avstað klokkan 1½. Tá ið skipini vóru farin, fóru kongur og drotningin ein túr gjøgnum Dyrehaven, og úr Torbek sóu tey fregattirnar krússa undir Hven (Christian 1995a: 478).

Eina góða viku áðrenn krúnprinsurin fór umborð, hevði spurningurin um føroyska handilin verið fyri í Statsráðnum. 15.mai 1844 hevði Rentukamarið nevniliga avgjørt, at handilin skuldi halda fram, meðan Rentukamarið samlaði saman allar upplýsingar um, hvussu handilin kundi gerast fríur fyri danskar undirsáttar. Á middegi henda sama dagin kom Statsráðið saman at viðgera spurningin um handilin, har Rentukamarið legði fram, og spurningin um skúlan í Føroyum, sum Kanselliið legði fram.

Í sínum viðmerkingum frá fundinum skrivaði kongur, at tilmæli Rentukamarsins var, at føroyski handilin skuldi halda fram óbroyttur, sjálvt um nevndin hevði mælt til at avtaka hann. Úrslitið gjørdist, at handilin fyri tíðina skuldi halda fram, men umhugsast skuldi, um hann kundi leysgevast fyri danskar handilsmenn. Kongur viðmerkti: „Mærkeligt nok at disse have søgt om Frigivelsen, men vist ej for at concurrere med alle Fremmede, og at Færingerne ej har søgt om Handelens Frigivelse.“ Krúnprinsurin skuldi hava øll pappírini frá nevndini við sær til Føroya fyri har at finna út av, hvussu stemningurin var, „især Henseende paa Færøerne selv og de Klager eller Poster, der maatte være om den færøiske Handels Førelse til Bedste for Færingerne.“ Krúnprinsurin skuldi eisini hava tilfar við um skúlan og seta seg inn í støðuna í Føroyum (Christian 1995a: 476).

Krúnprinsurin kom aftur av Føroyaferð síni 21. juli 1844, og seint tann seinnapartin spaseraðu kongur og krúnprinsurin í havanum (Christian 1995a: 498). Tá hava teir uttan iva umrøtt støðuna í Føroyum, og samrøðan helt fram dagin eftir, tá ið krúnprinsurin aftur vitjaði fyri at geva kongi sína frásøgn um handil og fiskivinnu við Føroyar (Christian 1995a: 499). Tíverri ber ikki til at siga nakað um, hvat sagt varð hesar dagar, og hvussu føroyaferðin ávirkaði støðutakan kongs. Tá var skipið „Seyen“ longu farið til Føroya at gera fiskiroyndir og læra føroyingar um fiskivinnuna, sum greitt verður frá í komandi kapitli. Tí var málið um føroyska handilin flutt, og møguliga var ikki so nógv at taka støðu til, fyrr enn royndirnar vóru lidnar.

## *12.4 Tillisch kabinettskrivari hjá kongi*

Tá ið kongur hesi árini skuldi taka støðu í føroyskum málum, hevði hann holla vitan um øll føroysk viðurskifti beint undir liðini á sær, tí fyrrverandi amtmaðurin í Føroyum, Christian Ludvig Tillisch, var kabinettskrivari hjá honum. Tillisch var amtmaður í Åbenrå, tá ið kongur 4. apríl 1841 heitti á hann at gerast kabinettskrivari (Christian 1995b: 148). 28. apríl 1841 tók Tillisch við sum kabinettskrivari, og kongur helt, at hansara fyrsta fundarfrágreiðing bar boð um, at hann var sera væl egnaður til uppgávuna, og hann setti seg væl inn í øll mál (Christian 1995b: 153). Hvussu stóra ávirkan tað fekk á føroysku málini, at Tillisch var kabinettskrivari, ber ikki til at siga, tí tað sæst ikki aftur í keldutilfarinum, men hugsandi er, at tað er tí, at samskiftið millum Tillisch og kong fyri tað mesta hevur verið munnligt.

Lítið er kortini at ivast í, at hann við vitan síni hevði stóra ávirkan, og hvussu stóran týdning, Tillisch hevði fyri kong, kom til sjóndar, tá ið Tillisch brádliga andaðist 13. september 1844. Í dagbók síni greiddi kongur frá, at hann var við fylgi sínum á ferð í Suðurjyllandi, og tá ið hann lá og svav í vogni sínum nær við bygdina Gram, vaknaði hann av einum skrálandi bónda, sum rann við síðuna av vogninum. Bóndin rópti: „Kammerherre Tillisch er død, det var saadan en



*Tað var ein stórur skelkur fyri kong at frætta, at kabinettskrivarin Tillisch brádliga var deyður 13. september 1844. Fyrrverandi amtmaðurin Christian Ludvig Tillisch andaðist í vøkru bygdini Gram, har hann eisini er grivin. (Mynd: wikicommons)*

prægtig Mand.“ Hetta rópti hann fleiri ferðir, men tá ið bóndin at enda datt, helt kongur, ar maðurin var annaðhvørt fullur ella sinnissjúkur, og tí koyrdi hann bara vindeygað aftur.

Rópini órógvaðu hann kortini, og hann greiddi drotningini frá, hvat maðurin rópti. Tá steðgaðu tey við amtmann Krogh, sum var komin ímóti teimum at fyrireika tey upp á syrgiligu hendingina. Kongur ásannaði, at talan var um „den sørgeligste Sandhed“. Komin fram fekk hann at vita, at Tillisch um kvøldið hevði havt tað fínt. Eftir borðhaldið hevði hann hugnað sær við familjuni hjá Krogh, yngsta dóttirin og kamarharri Blücher sótu við teborðið. Har hevði Tillisch sett ringin hjá ungu Krogh á sín fingur, og Blücher hevði spurt, um hann skuldi taka ringin aftur og nevnt hann ein syrgiring. Síðani høvdu teir í spølni barst um ringin, men Tillisch fór at bløða, og tá hevði Blücher sagt við gentuna, at hon skuldi ansa eftir ikki at fáa blóð á seg, tí annars fór hon at síggja eitt spøkilsi við andlitinum á Tillisch. Tað gjørdi hann, tí tey høvdu sagt frá spøkilsissøgum. Tillisch var eitt sindur í andaneyð, eftir at teir høvdu barst, men tá ið Johansen kom inn við pappírum, fór hann upp og inn í næstu stovuna. Har fór hann beinanvegin at hosta, sum um eitt asmatiskt herðindi kom yvir hann. Johansen leyp eftir vatni, og hini fóru inn til hansara og hildu honum upp ímóti sær í sofuni, men slím og blóð stóð úr munninum, og uttan at siga eitt orð fall hann deyður um í ørmum teirra. Ein æðr var helst brostin í bringuni ella við hjartað.

*Fáar dagar eftir, at bróðir hansara doyði, boðaði Frederik Ferdinand Tillisch frá, at hann var til reiðar at taka við starvinum sum kabinettskrivari. Á tann hátt helt kongur fram við at hava ein fyrrverandi føroyskan amtmann undir liðini á sær. F.F. Tillisch var kabinettskrivari hjá kongi, til einaveldið varð avtikið. Seinni var hann innanríkisráðharri í trimum umførum. Hann røkti gjøgnum árini mangar almennar uppgávur. Ein av teimum var at virka sum stjóri fyri Kongliga teatrið árini 1859-64. Hann hevði stóran áhuga fyri føroyskum viðurskiftum til sín doyggjandi dag 16. februar 1889.*
*(Mynd: Kongliga bókasavnið)*



Sorgin var øgilig, og serliga Blücher var illa fyri av tí skemtinum, hann hevði staðið fyri stutt frammanundan (Christian 1995a: 514–515).

Fýra dagar seinni boðaði Frederik Ferdinand Tillisch, sum var stiftamtmaður í Ålborg, frá, at hann var til reiðar at taka við starvinum sum kabinettskrivari eftir bróður sín, og tað starvið varð hann so settur í 20. september (Christian 1995a: 516). Kongur hevði sostatt framvegis ein fyrrverandi føroyskan amtmann undir liðini á sær, so vitan hansara um føroysk viðurskifti var góð.

Kongur og Rentukamarið gjørdu ikki so nógv meira við føroyska handilin komandi árini, meðan bíðað varð eftir, hvat úrslitið fór at verða av teimum kongligu fiskivinnuroyndunum, sum vóru farnar í gongd í Føroyum, og sum greitt verður frá í komandi kapitli. Fiskivinnuroyndirnar forðaðu kortini ikki Stættatinginum í Roskilde at taka spurningin til viðgerðar á heysti 1844, og meðan Rentukamarið og kongur bíðaðu eftir úrslitunum av fiskivinnuroyndunum, nærkaðist løtan alsamt meir og meir, til at kongur mátti lata fólkinum valdið í ríki sínum, og nýggju fólkaræðisligu skipanirnar arvaðu eisini spurningin um handilin í Føroyum. Hvussu hesar skipanir hugsaðu um føroyska handilin verður greitt frá í 15. kapitli.

## *12.5 Samandráttur*

Ein nevnd, sum longu í fleiri ár hevði viðgjørt spurningar um handilin í Grønlandi, fekk í 1840 til uppgávu eisini at umrøða føroyska handilin. Meðan nevndin kom til ta niðurstøðu, at Grønland enn ikki var til reiðar til frían handil, kom hon til eina heilt aðra niðurstøðu, Føroyum viðvíkjandi. Í Føroyum var almúgan, sambært nevndini, minst líka væl mentað, sum danska almúgan var, og við teirri heldur subjektivu metingini hvurvu orsøkirnir til at bíða við at avtaka Einahandilin, tí tá var ikki longur brúk fyri at leggja so nógva orku í at fyrireika føroyingar til nýggju tíðina. Nevndin helt heldur ikki, at neyðugt var at spyrja føroyingar fyrst, tí mongu árini við einahandli høvdu gjørt, at føroyingar ikki vóru førir fyri at taka rætta støðu til framtíðina.

Vórðu hesar niðurstøðurnar hjá nevndini fylgdar, vóru bæði beinini tikin undan javnvágsfelluni, men Rentukamarið valdi ikki at fylgja niðurstøðuni. Í staðin varð saman við kongi avgjørt, at fleiri fyrireikingar skuldu gerast, og kongur legði stóran dent á, at hann einki ynski hevði fingið úr Føroyum um at avtaka handilin. Tvørturímóti frætti hann bæði frá føroyingum í Keypmannahavn og frá krúnprinsinum, sum hevði verið og kanna viðurskiftini í Føroyum, at føroyingar vóru væl nøgdir við verandi støðu, og tí varð endin, at evstu myndugleikar valdu at halda fast í javnvágsfelluni nøkur ár afturat.

Tá ið henda avgerð varð tikin, kundu hvørki kongur ella Rentukamarið vita, at teirra tíð við valdið var um at renna út, og at tað tí fór at gerast nýstovnaða fólkaræðið, sum slapp at taka endaligu avgerðina um avtøkuna av Einahandlinum.

# 13. kapittul
# *Kongligar fiskiroyndir*

Statsráðið tók 15. mai 1844 avgerð um, at Einahandilin og fyrireikingarnar at avtaka hann skuldu halda fram, men júst, hvussu Rentukamarið kom fram til hetta tilmælið, og hvønn leiklut kongur sjálvur hevði í avgerðini, er ógreitt. Søgan um tær kongligu fiskiroyndirnar, sum vórðu gjørdar árini 1844-46, geva kortini eina ábending um, at avgerðin í hvussu er partvíst var tikin orsakað av øðrum tilvildarligum samanføllum, og tað, at avgerð var tikin um at fara undir fiskiroyndirnar tveir mánaðir undan endaligu avgerðini í Statsráðnum, vísir, at avgerðin 15. mai mest av øllum var ein staðfesting av einum veruleika, sum longu var farin í gongd.

Meðan umrøtt varð, hvør støða skuldi takast til álitið, sum mælti til fullkomiligan fríhandil í Føroyum, lýsti Børsurin í Keypmannahavn við, at stóra briggin „Seyen“ skuldi seljast á uppboði 13. februar 1844. Skipið var partur av búnum eftir J.J. Benedictsen og einkju hansara. Eitt annað og minni skip hjá sama handilsmanni, „Maria“, skuldi eisini seljast sama dag, og dagin fyri varð handilin í Vestmannaoyggjum, „Garden“ nevndur, seldur. „Seyen“ var 64½ kommersulestir til støddar, og hon varð seld við øllum reiðskapi og innbúgvi[155]. Skipið hevði verið brúkt til fiskiskap undir Íslandi, og tað var sera væl útgjørt til hesa vinnu. Tað var realisatiónsnevndin fyri handilin, sum hevði sett briggina á uppboðssølulistan, og til søluna varð lovað, at komandi eigarar skuldu fáa 470 ríkisdálar árliga í ríkisstuðuli, um teir hildu fram at nýtta „Seyen“ til fiskiskap undir Íslandi[156]. Rentukamarið vildi fegið sleppa undan skylduni at gjalda henda peningin á hvørjum ári, og stjórnarlimir í Rentukamarinum fóru tí til kong at umrøða søluna. Kongur gav teimum munnligt loyvi til at keypa skipið, og Rentukamarið fekk „Seyen“ fyri 7.500 ríkisdálar.

Í fyrstu syftu var óvist, hvar henda útreiðslan skuldi bókast, men tað fóru teir at finna út av, tá ið avgerð varð tikin um, hvat skipið skuldi brúkast til. Rentukamarið fekk skjótt at vita, at kongur helst vildi, at briggin skuldi brúkast til at fiska undir Føroyum, so at føroyingar fingu møguleikan at læra, hvussu fiskiskapur av hesum slagnum skuldi drívast[157]. Tað er ein greið ábending um, at kongur átti stóran lut í avgerðini at halda fram við verandi skipan, og at Rentukamarið læt seg ávirka av kongsins støðu. Støðan var nú beint øvut av støðuni fyrst í øldini,

155 Kunngerð í Kjøbenhavns kongelig alene privilegerede Adressecomptoirs Efterretninger. Nr. 36 frá 12. februar 1844.

156 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 7. januar 1845.

157 SA. Rentekammeret: Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 20. mars 1844.

sum er lýst í kapitli 4.12. Tá vildi kongur hava broytingar at henda, men hesar hugsanirnar fánaðu, so hvørt sum tær komu longri og longri út til teir lokalu embætismenninar, sum skuldi føra tær út í verki. Nú var breið semja millum embætismenninar í Føroyum, handilsáhugamál í Keypmannahavn og í hvussu er onkur umboð fyri Rentukamarið og Handilsstjórnina um, at Einahandilin átti at verið avtikin beinanveg, men kongur vildi tað øðrvísi. Nú var tað eftir øllum at døma serliga kongur, sum helt fast í, at føroyingar skuldu fyrireikast meira, og tí var tað serliga hann, sum gjørdi, at statsins partur av javnvágsfelluni slapp at halda fram.

Í hesum kapitlinum verður fyrst hugt at, hvussu fiskiroyndirnar gingu. Síðani verða viðurskiftini viðvíkjandi føroysku manningini umborð lýst, og nakað nógv verður gjørt burtur úr fiskavirkingini, tí sjálvt um tað ikki upprunaliga var ætlanin, so gjørdist tað júst hesin parturin av royndunum, sum fekk størstu ávirkanina á menningina av einari føroyskari fiskivinnu.

## *13.1 H.A. Clausen á odda*

Kongur skrivaði 20. mars 1844 undir eina resolutión, sum formliga heimilaði keypið av skipinum og av teimum útreiðslum, sum skuldu til fyri at gera skipið klárt. Tá ið kongur skrivaði undir, var kostnaðurin ógreiður, men Rentukamarið helt ikki, at kostnaðurin fór at gerast so stórur, at hann stóð mát við „den heldigste Indflydelse paa Færøernes Opkomst ved Beboernes fremtidige Deeltagelse i Enhver af de Rigdomme Havet i sammes Nærhed frembyder.“[158] Í hesi resolutiónini stóð ikki meira um sjálvt endamálið við royndunum hjá „Seyen“, men árið eftir varð endamálið lýst sum, at „Skibet skulle anstille et Forsøg i det større med Fiskeri under Færøerne, navnligen for at give Færingerne Adgang til at lære, hvorledes et saadant Fiskeri bør drives.“[159]

Fyri at fáa tingini at ganga skjótari, helt Rentukamarið, at H.A. Clausen keypmaður skuldi yvirtaka raksturin av „Seyen“. Clausen var kønur maður, tí hann rak fleiri skip, sum fiskaðu undir Íslandi og var millum fremstu keypmenninar har, og hann var sera áhugaður í málinum. Clausen tók sær av at gera tær umvælingarnar, sum vóru neyðugar, og hann fekk eisini fatur á einari royndari manning. Henda veturin lá ísurin leingi í Keypmannhavn, men 10. apríl bar endiliga aftur til hjá skipum at sigla, og „Seyen“ fór avstað longu sama dag[160].

---

158 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 20. mars 1844.

159 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 7. januar 1845.

160 Berlingske politiske og Avertissements-Tidende nr. 328 frá 3. desember 1844. Í grein hjá Hans A. Clausen nevnd „Nogle Bemærkninger“.

*Hans Arreboe Clausen keypti handilin í Ólafsvík og skip frá stjúkpápa sínum í 1834, og síðani víðkaði hann dúgliga um íslandshandil sín. Tað var tí ein maður við røttu royndunum, sum varð settur at skipa fyri fiskivinnuroyndunum í Føroyum (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



# *13.2 Fiskiskapurin*

### 13.2.1 „Seyen" í 1844

Tað fyrsta, sum í Føroyum frættist um kongligu fiskiroyndirnar, var, tá ið Pløyen amtmaður fekk bræv dagfest 6. apríl. Í brævinum fekk hann at vita, at hann skuldi fylgja væl við skipinum og hjálpa teimum upp á allar mátar. Hetta vóru gleðilig boð hjá Pløyen at fáa, og hann segði, at tað hevði givið honum „en inderlig Følelse af Glæde over en Forestilling, som kan og forhaabentligen vil faae en stor og væsentlig Indflydelse paa det færøske Fiskeris Opkomst." Boðini um, at hann skuldi fylgja væl við og hjálpa sum best við royndunum hjá „Seyen", var ein skylda, sum var honum bæði „kjær og behagelig", og henda uppgávan „vil være stemmende med de Ønsker for de fær. Fiskeri, som jeg i lang Tid har næret."

Pløyen hevði bíðað sum longst við at skriva aftur til Rentukamarið, tí hann vónaði at frætta frá fyrsta túrinum hjá „Seyen", áðrenn hann svaraði. Beint áðrenn „Havfruen" fór úr Føroyum, kom briggin inn á Havnina. Johansen skipari boðaði frá, at teir á fyrsta túrinum næstan einki høvdu fingið. Tað kom kortini ikki óvart á Pløyen, tí hann hevði ikki roknað við, at skipið fór at fáa nakað fyrsta túrin, tí hann visti frá útlendskum fiskimonnum, at várfiskiskapurin var liðugur, tá ið skipið kom, og enn var summarfiskurin ikki komin.

Túrurin var kortini ikki nyttuleystur, tí „Seyen" hevði kannað og mált ein stóran banka í ein útsynning úr Føroyum. Har var skiparin eisini umborð á einum skipi úr Ostende fyri at kanna, hvussu teir fiskaðu. Skiparin var serliga

hugtikin av drívseglinum, sum teir sleipaðu eftir skipinum fyri at fáa tað at reka minni. Belgiarin hevði kortini heldur ikki fingið nakran fisk[161].

Um mánaðaskiftið mai-juni kom „Seyen" aftur á Havnina og landaði 4000 toskar. Henda fongin hevði skipið fingið uppá 19 dagar. Allir hesir 19 dagarnir høvdu ikki verið góðir at arbeitt í, og tá ið havt varð í huga, at meir enn helmingurin av manningini vóru ungir menn og lærlingar, helt Pløyen, at hetta var eitt nøktandi úrslit. „Seyen" rak illa við streyminum, og skiparin gramdi seg um, at nógv tíð varð brúkt til at sigla aftur á bankarnar[162].

Blekkið á frágreiðingini um annan túrin hjá „Seyen" var nóg illa tornað, tá ið skipið kom aftur á Havnina. Hesa ferð høvdu teir fiskað 3.600 góðar og stórar toskar norðan fyri Føroyar upp á 10 arbeiðsdagar[163]. Í juli var „Seyen" aftur á Havnini við 3.400 toskum, so teir tilsamans høvdu fingið umleið 11.000 fiskar[164].

Síðst í juli steðgaði „Seyen" við royndunum at fiska tosk, og í august fóru teir at royna eftir hákelling. Veðrið var vánaligt henda augustmánaðin, og tí hevði ikki borið til at fiska hákelling, tí tá skuldi skipið liggja til akkers. „Seyen" hevði mist báðar armarnar á einum akkeri. Umstøðurnar gjørdu, at teir bara høvdu fingið 24 hákellingar, sum góvu 18 tunnur av livur. Johansen skipari ivaðist kortini ikki í, at nógv var at fáa, og hann hevði góðan hug at royna hesa veiðuna aftur seinni. Til hákellingaveiðuna fekk „Seyen" spik av grindahvali og springara, tí Pløyen megnaði ikki at fáa fatur á nøkrum kópaspiki, sum annars var tað besta agnið. Pløyen hevði bílagt kópaspik, og eftir at „Seyen" var farin út, kom nakað av tí, men tað kundi hann goyma til árið eftir.

#### *13.2.1.1 Hugsanir Pløyens um fyrsta royndarárið*

Samanumtikið helt Pløyen, at úrslitið av royndunum hjá „Seyen" var gott, men havast skuldi í huga, at skipið kom ógvuliga seint á grunnarnar, og at skiparin skuldi hava tíð til at venja seg við umstøðurnar. Hann skuldi finna bestu miðini og venja seg við streymin, sum Pløyen hevði skilt ávirkaði fiskaríið meir í Føroyum enn í Íslandi. Føroyingarnir umborð kundu geva skiparanum nakað av vegleiðing um streym, men miðini kendu teir einki til, tí tey vóru so langt úr landi, at útróðrarbátar ongantíð høvdu verið har.

Pløyen helt, at tað hevði víst seg, at briggin, sum var 64½ lestir, var ov stór til at fiska undir Føroyum, og hon var størri enn tey fronsku, ensku og hollendsku skipini, sum royndu á somu leiðum. Undir Íslandi royndu fransmenn við so stórum skipum, men her vóru tey ongantíð. Skiparin greiddi eisini frá, at briggin rak við streyminum, meðan smærru fiskiskipini ikki róku líka nógv við drívseglum. Úrslitið var, at nógv tíð fór til spillis við at sigla aftur á bankar og mið. Pløyen metti, at skip á 20 til 30 læstir við seglføring sum jakt var tað best

161 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 42. Bræv til Rentukamarið dagfest 8. mai 1844.
162 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 63. Bræv til Rentukamarið dagfest 17. juni 1844.
163 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 66. Bræv til Rentukamarið dagfest 18. juni 1844.
164 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 83. Bræv til Rentukamarið dagfest 24. juli 1844.

egnaða til fiskiskap undir Føroyum. Eitt slíkt skip kundi við drívsegli liggja betri í streymi, og tað tók ikki so nógvan vind á seg sum eitt størri skip. Harumframt kundi tað lættliga sigla á sundum og firðum. Um royndin skuldi endurtakast árið eftir, mælti Pløyen tí til, at byrjað varð longu í mars, tí tá var nógvur fiskur at fáa, um veður var til tað.

Skiparin, M.N. Johansen, fekk besta skoðsmál frá Pløyen, tí hann hevði alla tíðina verið íðin, og hann var ein góður sjómaður og sera áhugaður í fiskarínum. Hann fiskaði ikki bara, tí tað var hansara livibreyð, men eisini tí hann var áhugaður í royndunum.

Hákellingaveiðan hevði ikki givið nakað serligt úrslit, men Pløyen roknaði við, at nógv var at fáa av hákelling, tí útróðrarmenn fingu javnan hákelling á toskalínu, og Johansen skipari metti eisini, at nógv var at fáa. Har lá ein nýggjur inntøkumøguleiki hjá landinum.

Rentukamarið váttaði móttøku av frágreiðing frá amtmanninum um fiskiroyndirnar hjá „Seyen", sum hann hevði sent 16. september 1844. Tá Clausen keypmaður kom við sínari meining um royndirnar, og úrslitið av søluni var greitt, fóru teir at leggja málið fyri kong, sum so skuldi avgera, um royndin skuldi endurtakast, og í so fall hvussu. Teir ynsktu, at amtmaðurin fór at vera líka trúgvur komandi ár, um kongur avgjørdi at royna aftur[165].

### *13.2.1.2 Carl Irminger hevði metingar um føroyska fiskivinnu*

Áðrenn Clausen fekk høvi at senda sínar viðmerkingar til Rentukamarið, blandaði Carl Irminger, kapteinloytnantur, sum seinni gjørdist kendur, tá ið Irmingerhav varð uppkallað eftir honum, seg upp í málið. Hann hevði verið í Føroyum saman við krúnprinsinum hetta summarið, og soleiðis hevði hann fingið høvi til at seta seg inn í føroyska fiskivinnu, og hvørjir møguleikar vóru fyri at menna hana. Hesar hugsanir legði hann fram á fundi í felagnum Foreningen for Søfartens Fremme 13. november 1844.

Irminger legði út við at siga, at hann helt fyrilesturin í felagnum, tí tað hevði til endamáls at menna danska sjóvinnu, og í Føroyum var „en Green af Søfarten, der efter min Mening fortjente en videre Udvikling, da Havet omkring disse Øer er velsignet med en ualmindelig Fiskerigdom, som af os, skjønt henhørende til en søfarende Nation, desværre kun er saare lidet benyttet."

Síðani greiddi hann frá føroyska útróðrinum, og hann vísti á, at stóri trupulleikin hjá útróðrarmanninum var, at hann hevði so langan tein á fiskileið. Fiskiskap við deksførum visti hann lítið og einki um, og tí var tað kærkomið fyri øll, sum høvdu áhuga í sjóvinnu, at tað almenna hevði gjørt royndir við „Seyen". Hann helt ikki, at royndin var so væleydnað, tí hon mól ikki runt fíggjarliga, men hann hevði nakrar hugsanir um, hví so var, og hví tað tí ikki var neyðugt at missa mótið. Fyrsta frágreiðingin var, at besta fiskitíðin í Føroyum var um várið í februar,

165 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra P, bræv nr. 459. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannin dagfest 12. oktober 1844.



*Carl Irminger fekk tíðliga til uppgávu at læra krúnprinsin sjómansskap, og tað gjørdist byrjanin til lívslangt vinarlag teirra millum. Tí var hann eisini við á ferðini hjá Fríðriki krúnprinsi í Føroyum í 1844, og her fekk hann gott innlit í tær fiskivinnuroyndirnar, sum vórðu gjørdar sama ár.*
*(Mynd: Kongliga bókasavnið)*

mars og apríl, og tá var „Seyen“ ikki komin til Føroya. Ein onnur frágreiðing var, at „Seyen“ var ov stórt skip og hevði ov stóra seglføring, soleiðis at hon rak av bankunum skjótari, enn smærri skip gjørdu. Hesar hugsanir samsvaraðu væl við viðmerkingarnar hjá Pløyen amtmanni.

Irminger hevði sjálvur á einum fjalli í Suðuroy sæð 21 fremmand fiskiskip 3. juli, og hann hevði eisini verið umborð á skipum úr ávikavist Dunkerque og Gravelines, nevnd „Fibélité“ og „Jeune Alphonse“. Har fekk hann at vita, at 98 skip úr teimum báðum havnunum vóru farin til Íslands og Føroya at fiska. Umborð vóru 1443 menn, og meir enn helvtin av hesum skipunum fiskaðu undir Føroyum tíðliga í juli. Tá ið Irminger var umborð, vóru skipini í Havn fyri at taka vatn til heimferðina, og bæði skipini høvdu fulla last og fleiri tunnur fullar av saltaðum toski.

Niðurstøðan hjá Irminger var, at fiskast skuldi við skipum á 15 til 20 lestir. Tey vóru nóg stór til at kunna klára seg í ringum sjógvi, og tey megnaðu eisini at sigla millum Danmark og Føroyar. Umborð skuldu vera 10 til 12 mans, og tann parturin av hesi manning, sum ikki nýttist til siglingina, kundi vera føroyingar. Tá ið fiskiskapurin var liðugur, skuldu skipini leggjast í Vestmanna fyri veturin, og skiparin og ein ella tveir av manningini vera eftir. Teir fóru at hava ivaleyst at gera við viðlíkahaldi og øðrum, so at klárt var at fara út aftur fyrst í februar við føroyingum umborð. Irminger helt, at rættast var at byrja hesa royndina við

3 skipum, og hann roknaði við, at var eitt sindur av hepni við, so fóru hesi trý skipini at fiska upp undir lúkurnar einar 2-3 ferðir um árið.

Felagið til Søfartens Fremme setti henda fyrilesturin í bløðini í vónini um, at henda vitanin fór at eggja privatum til at royna seg, og felagið vildi fegið hjálpa til, um onkur helt seg framat. Felagið legði afturat, at Irminger hevði sagt, at Einahandilin ikki var nøkur forðing fyri, at fiskiskapur bar til, men tað helt kortini eisini, at ein avtøka av Einahandilinum var besta leiðin at menna fiskivinnu í Føroyum[166].

### *13.2.1.3 Clausen tekur saman um fyrsta árið*

Í svari til Irminger segði Hans A. Clausen, at hann var samdur í tí mesta, men hann helt kortini, at ein orsøk til, at tað gekst so nógv betur hjá t.d. fronskum skipum, var, at hýran hjá fólkinum umborð var partur av fonginum, men hann roknaði við, at tað fór at verða torført at fáa danskar borgarar at góðtaka slíkar treytir. Annars var hann samdur í, at tað var rætt at byrja fiskaríið í februar ella mars, og hann var eisini samdur í, at „Seyen" var ov stór til fiskiskap við Føroyar, sjálvt um hon var væl egnað undir Íslandi. Samanumtikið vísti hann í grein síni á, at tá ið kostnaðurin av at umvæla skipið ikki var tikin við, so mól royndin við „Seyen" so nøkulunda runt. At enda vónaði hann, at fleiri donsk skip fóru at fáast við fiskivinnu við Føroyar, tí „Rigets Territorialhøihed saaledes hævdes der"[167].

Hesar hugsanir Clausens sóust aftur í frágreiðingini, hann sendi til Rentukamarið um royndirnar, og hansara frágreiðing samsvaraði eisini í høvuðsheitum við frágreiðingina hjá Pløyen. Clausen helt, at tað var rætt at gera eina roynd afturat, tí nú kendu teir bankarnar, og hvar fiskurin stóð til ymsar tíðir. Hinvegin helt Clausen ikki, at tað var rætt at brúka eitt so stórt skip til fiskiroyndirnar. Rættari var at senda 2 ella 3 skip á 18 til 30 lestir avstað, og tað var mestsum tað sama, sum Irminger var komin fram til.

Clausen hevði gjørt roknskapin upp fyri fiskiroyndina. Hann vísti, at útreiðslurnar tilsamans vóru 3470 ríkisdálar og 57 skillingar, og um eitt árs renta av keypi og umvæling av „Seyen" skuldi við, so var tað 358 ríkisdálar ella 3838 ríkisdálar 57 skillingar tilsamans. Klippfiskurin og hákellingalivurin gav á børsinum 2764 ríkisdálar og 81 skillingar, og Einahandlin rindaði 532½ ríkisdálar fyri fraktina, sum „Seyen" hevði siglt fyri handilin. Samlaðu inntøkurnar vóru tí 3297 ríkisdálar og 35 skillingar. Undirskotið var sostatt 531 ríkisdálar og 22 skillingar. Hinvegin hevði kongur spart teir 470 ríkisdálarnar, sum annars skuldu verið latnir í studningi til tann, sum fór at fiska við „Seyen", so tað mól næstan runt.

166 Berlingske politiske og Avertissements-Tidende nr. 316 frá 21. november 1844. Grein nevnd „Fiskerierne ved Færøerne".

167 Berlingske politiske og Avertissements-Tidende nr. 328 frá 3. desember 1844. Grein nevnd „Nogle Bemærkninger ved Hr. Capitain-Lieutenant Irmingers Afhandling om Fiskerierne ved Færøerne".



*Meðan „Seyen" royndi seg sum fiskiskip kring Føroyar í 1844, vitjaði Fríðrikur krúnprinsur landið. Her fylgir hann við grindadrápi í Miðvági 29. juni. Málningin málaði Frederik Theodor Kloss eftir ferðina. (Mynd: Tjóðsavnið 6790F09)*

### *13.2.1.4 Niðurstøðan hjá Rentukamarinum*

Rentukamarið helt, at hetta úrslitið var „endog meget heldigt", tá ið hugsað varð um allar umstøðurnar. Rentukamarið helt eisini, at ein rúgva av hentari vitan var komin burtur úr royndunum. Niðurstøðan hjá Rentukamarinum var tí, at úrslitið í sær sjálvum var nóg stór eggjan til at gera fleiri royndir í 1845. Hesar royndirnar skuldu ikki bara gerast fyri at læra føroyingar upp, men eisini fyri at vísa vegin fyri donskum handilsmonnum og øðrum spekulantum. „Seyen" var ikki rætta skipið, og tí vildi Rentukamarið hava kongsins loyvi til at selja tað aftur, og annars vildu teir fylgja tilmælinum hjá Clausen um 3 smærri skip. Tað var sjálvandi óvist, hvussu dýr ein slík roynd fór at verða, men Rentukamarið mælti til, at upp til 20.000 ríkisdálar vóru tøkir. Teir ivaðust ikki í, at hesin peningur varð vunnin inn aftur eftir fáum árum, so tað var líkamikið, um tað var finanskassin ella føroyski handilin, sum legði peningin út.

Rentukamarið var sera væl nøgt við arbeiðið, sum H.A Clausen hevði gjørt við at leiða royndirnar, og ikki minst at hann sjálvur hevði verið í Føroyum fyri at tryggja sær, at hansara boð vórðu fylgd, og fyri við egnum eygum at kunna seg um viðurskiftini. Tað týdningarmiklasta var tó, at hann hevði funnið ein so góðan skipara og fiskavirkara, tí tað var helst arbeiðið hjá teimum báðum, sum var mest avgerandi fyri úrslitið. Tí var upplagt, at Clausen eisini stóð fyri fiskiroyndunum í 1845. Hann hevði fingið 2 prosent av útreiðslunum og

av søluprísinum í samsýning, og tað var í árinum blivið til 136 ríkisdálar og 67 skillingar. Fyri hesa samsýning hevði hann tikið sær av øllum tí, sum ein privatur reiðari vanliga hevði at gera, umframt at hann hevði verið í Føroyum. Tí hevði hann helst heldur havt tap enn vinning av hesi uppgávuni. Tað átti hann at verið viðurkendur fyri, og hann var eisini sum keypmaður í Íslandi javnan positivt umrøddur í frágreiðingum til Rentukamarið frá Thorsteinsson amtmanni í Vesturamti. Tí helt Rentukamarið, at Clausen átti at „benaades med en passende Rang."

Samanlagt mælti Rentukamarið kongi til, at tað fyri almenna rokning aftur í 1845 varð gjørd ein fiskiroynd undir Føroyum, at skipið „Seyen" varð selt, at 20.000 ríkisdálar vóru settir av til royndirnar, at Hans Arreboe Clausen varð settur at standa fyri royndunum, og at Clausen varð útnevndur til agent í 6. klassa nr. 7 sambært rangskipanini frá 14. oktober 1746. Hesum tók kongur undir við og undirskrivaði 7. januar 1845[168]. Tá var klárt at fara undir annað árið við fiskiroyndum.

### 13.2.2 „Karen Knuth", „Hanne & Marie" og „Jylland" í 1845

Við nýggju ætlanunum í huga, fór Clausen undir at fyrireika royndirnar í 1845. „Paa en Reise i Provindserne" keypti hann trý skip til royndirnar. Tey vóru „Karen Knuth", ið var 24½ lest, „Hanne & Marie", ið var 20½ lest, og sluppin „Jylland", ið var 14½ lest. Prísurin var 12.870 ríkisdálar og 95 skillingar. At føra skipini fann hann menn, sum høvdu royndir við fiskaríi undir Íslandi[169].

„Hanne & Marie" og „Jylland" komu á Havnina 29. apríl, og tey lossaðu beinanvegin timbur til eitt pakkhús. „Karen Knuth" kom 7. mai og fór beint til fiskiskap. 5 ella 4 føroyingar fóru umborð á hvørt skipið, og tá ið tey fóru útaftur, høvdu tey kópaspik við sum agn til hákellingaveiðuna, um tað vísti seg at verða áhugaverdari at royna eftir henni heldur enn eftir toski[170].

Fyrstu tveir mánaðirnar gekst illa at fiska. Lítið var at fáa, tí veðrið var vánaligt við nógvum stormi og nógvari vætu. Í Íslandi gekst eisini illa hjá fronsku og belgisku skipunum, so fleiri av teimum vóru komin til Føroya at royna. Síðst í juni visti Pløyen at siga, at sluppin „Jylland" hevði verið í Álakeri tvær ferðir við tilsamans 2200 toskum, „Hanne & Marie" hevði eisini landað tvær ferðir tilsamans 2900 toskar, meðan „Karen Knuth" á einum túri hevði fingið 1000 toskar. Fiskurin var stórur og feitur og sá út til at fara at verða góður klippfiskur, sjálvt um tað var ein kampur hjá fiskavirkaranum at arbeiða í váttliga veðrinum[171].

16. september skrivaði Pløyen til Rentukamarið um royndarfiskiskapin. Hann helt, at sum heild hevði fiskiskapurin ikki verið heppin. Sluppin „Jylland" hevði

168 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 7. januar 1845.

169 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 19. februar 1847.

170 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 248. Bræv til Rentukamarið dagfest 14. mai 1845.

171 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 262. Bræv til Rentukamarið dagfest 28. juni 1845.

fiskað 6201 fiskar, jaktin „Karen Knuth“ 4668 og jaktin „Hanna & Marie“ 4562 fiskar. Hesin fiskur varð virkaður til 150 skippund av klippfiski. Orsøkin til vánaliga úrslitið var serliga, at veðrið hevði verið óvanliga vánaligt, og havið ókyrt. Lítið av fiski hevði verið at sæð kring Føroyar, og tað sama frættist úr Íslandi.

Meðan tað gekst illa hjá kongligu skipunum at veiða tosk, gekst betur hjá tí fyrsta privata handilsmanninum, sum var komin til Føroya at royna eydnuna í fiskivinnuni, tí Skibsted fekk nógv burtur úr hákellingaveiðuni hetta summarið. Virksemið hjá Skibsted verður gjølligari lýst í komandi kapitli. Úrslitini hjá Skibsted gjørdu, at Pløyen gav skiparunum agn til hákellingaveiðu og tilfar til tunnur í mai, men skipararnir tóku síni boð so ítøkiliga, at teir hildu seg til toskaveiðuna og goymdu hákellingina til augustmánað. Tá var bara ikki líka nógv at fáa. Ein orsøk var, at nógvur stormur var í august, og sjógvurin legði seg ikki aftur, sjálvt um einstakir góðir dagar vóru ímillum. Pløyen helt kortini, at tað serliga var vantandi kunnleiki um henda fiskastovn, sum var orsøk til vánaliga úrslitið. Hann hevði hoyrt, at hákellingin hvarv úr føroyskum sjógvi ávísa tíð á árinum. Tá fór hon undir Ísland og leitaði so í djúpan sjógv. Møguliga var tað í gýtingartíðini. Aðra frágreiðing dugdi hann ikki at finna til, at nógv var at fáa av hákelling í mai, juni og juli, men einki í august[172].

Hákellingaveiðan gav lítið og einki av sær. Tað tyktist, sum hákellingin heilt var horvin. Clausen gav tveimum av sínum egnu jaktum, sum fiskaðu hákelling undir Íslandi, boð um at royna eftir hákelling undir Føroyum á veg niður til Danmarkar, men úrslitið hjá teimum var líka vánaligt sum hjá kongligu skipunum.

„Jylland“ og „Karen Knuth“ tóku framleiddu vørurnar við sær aftur til Danmarkar í seinnu helvt av oktober. Samlaða úrtøkan gjørdist 154 ¾ skippund av klippfiski, 14 tunnur av hákellingalivur, 12 tunnur av toskalivur og 19 tunnur av sild. 30 skippund lógu eftir, sum ikki vóru liðugt virkað[173]. Vøran varð seld á børsinum í Keypmannahavn fyri 3336 ríkisdálar og 62 skillingar netto[174].

Úrslitið fyri 1845 varð ikki mett at vera nóg gott, og Clausen helt, at orsøkin var, at fiskurin ikki hevði leitað sær til havið kring Føroyar, og at veðrið hevði verið so vánaligt, at hákellingaveiðan miseydnaðist. Harumframt kom sjálvandi, at skipini komu alt ov seint í gongd orsakað av ísviðurskiftunum í Danmark. Royndir vóru eisini gjørdar at fiska sild, men Clausen helt, at tað fór ongantíð at loysa seg at fiska sild saman við øðrum havfiskiskapi, tí tað kostaði ov nógv, og fongurin varð ikki væl móttikin.

### 13.2.3 Royndirnar í 1846

Enn var møguleikin at royna várfiskiskapin við skipum ikki troyttur, og tað var fyri at gera hesa royndina, at jaktin „Hanne & Marie“ og skiparin, sum æt

172 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 314. Bræv til Rentukamarið dagfest 16. september 1845.

173 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 334. Bræv til Rentukamarið dagfest 30. oktober 1845.

174 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 19. februar 1847.



*Veiðan hjá kongligu royndarskipunum varð seld á Børsinum í Keypmannahavn. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Petersen til eftirnavn, vórðu verandi eftir í Føroyum henda veturin[175]. „Karen Knuth" fekk í november ein farm av ertrum at føra til Onglands. Tann túrurin eydnaðist væl, og 7. januar lá hon klár í Newcastle at fara til Føroya við eini last av Liverpool salti. „Hanne & Marie" fór at fiska longu 16. januar, og sama dag kom „Karen Knuth" á Havnina. Tá ið saltið var landað, var klárt at fara til fiskiskap 7. februar. „Jylland" fór úr Danmark 2. mars, og kom til Føroya 18. mars[176].

Øll skipini vóru sostatt farin at fiska í vártíðini, men várfiskiskapurin vísti seg at gerast eitt vónbrot. 28. mars 1846 visti Pløyen at siga, at kongligu skipini bara høvdu fiskað 16 ella 17 hákellingar[177], og hvørki í apríl ella í mai hetta árið var veðrið til vildar, tí tað skifti millum regn og storm. Fyrst í mai sást nakað av toski á grunnunum, og kongligu skipini høvdu fram til 28. mai landað umleið 5000 fiskar, men hákelling fekst framvegis lítið av[178].

Summarið 1846 var merkt av, at meslingarnir gingu um allar Føroyar, men í endanum á einari daprari frágreiðing um hesa støðuna greiddi Pløyen 4. juli frá, at fiskaríið hevði verið gott síðstu tíðina, serliga norðanfyri. Kongligu skipini

175 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 334. Bræv til Rentukamarið dagfest 30. oktober 1845.

176 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 19. februar 1847.

177 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 366. Indberetning um landets tilstand til Rentukamarið dagfest 28. mars 1846.

178 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 394. Bræv til Rentukamarið dagfest 28. mai 1846.

høvdu avreitt nógvan stóran og feitan tosk, men hákellingafiskaríið var framvegis vánaligt[179].

Góða fiskaríið norðanfyri helt á restina av summarinum,[180] men summarið 1846 var sera váttligt, og um mánaðarskiftið august/september góvust kongligu skipini at fiska, tí vandi var fyri, at tað ikki eydnaðist at turka fiskin. Hákellingaveiðuni kom sum heild einki burturúr. Tí fóru „Hanne & Marie“ og „Jylland“ at sigla heim , meðan „Karen Knudt“ ætlaði at bíða einar tvær vikur afturat, so hon kundi taka fiskin, sum vónandi var tornaður tá, við sær til Danmarkar. Skipini høvdu fingið 18000 fiskar av góðum og feitum toski, sum var mettur at geva 170 til 180 skippund av klippfiski. Pløyen helt tað vera góðan og væl virkaðan fisk[181].

24. september 1846 visti Pløyen at siga, at „Karen Knudt“ var farin avstað. Tá kundi hann eisini gera upp, hvat var komið burturúr. „Hanne & Marie“ við Petersen skipara hevði fiskað 2066 toskar, sum vórðu til 28 skippund av klippfiski, og hon hevði eisini fingið 32 tunnur av hákellingalivur. „Karen Knudt“ við Johansen sum skipara hevði fingið 7047 toskar, sum vórðu til 74 skippund og 11 lispund av klippfiski, og hon hevði fingið 25 tunnur á hákellingalivur og 6 tunnur av toskalivur. At enda fekk sluppin „Jylland“ við Christensen sum skipara 9444 toskar, sum vórðu til 102 skippund og 2 lispund av klippfiski, og harumframt komu 3 tunnur av hákellingalivur og 4 tunnur av toskalivur. Tað síðsta, sum Christensen fiskaði, varð saltað í 8 tunnur, tí tað var liðið so langt út á árið, at hesin fiskur ikki kundi virkast til klippfisk[182].

Pløyen helt, at árið var gott hjá skipunum, sjálvt um úrtøkan ikki rakk til allar útreiðslurnar av fiskiroyndunum,[183] og 30. oktober 1846 roknaði Pløyen framvegis við, at fiskiroyndirnar fóru at halda fram, tí í sambandi við, at amtið tók stig til keypa setepli úr Danmark, nú eplasjúka gjørdi um seg sunnanfyri, helt hann tað vera upplagt, at eitt av royndarskipunum tók eplini við til Føroya[184].

Tá ið Rentukamarið gjørdi endaliga úrslitið upp fyri 1846, var fongurin 18.693 toskar, sum virkaðir vórðu til 199 skippund 14 lispund og 2 pund av klippfiski og átta tunnur av saltaðum stórtoski ella kabliau. Hákellingaveiðan hevði givið 59½ tunnu av livur, og saman við toskalivur gjørdist tað til 42 tunnur av lýsi. Øll henda vøran varð á børsinum seld fyri 4810 ríkisdálar og 27 skillingar.

### 13.2.4 Rentukamarið steðgar fiskiroyndunum

Viðvíkjandi royndunum í 1846, kundi Rentukamarið staðfesta, at royndirnar at koma fyrr á bankarnar, sum m.a. Irminger hevði mælt til, vístu seg ikki at geva

179 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 8. Bræv til Rentukamarið dagfest 4. juli 1846.
180 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 40. Indberetning om Landets tilstand dagfest 27. august 1846.
181 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 46. Bræv til Rentukamarið dagfest 4. september 1846.
182 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 53. Bræv til Rentukamarið dagfest 24. september 1846.
183 TSS. Færø Amt. Kopibok Ø, bræv nr. 87. Bræv til Rentukamarið dagfest 26. oktober 1846.
184 TSS. Færø Amt. Kopibok Ø, bræv nr. 99. Bræv til Rentukamarið dagfest 30. oktober 1846.

nakað stórvegis betri úrslit, tí heilt til endan á apríl høvdu skipini bara fingið 1200 toskar og 25 tunnur av livur. Í mai var fiskaríið betri, men tá fingu skipini trupulleikar av, at tey ikki fingu nóg nógvar føroyingar til at manna skipini, meðan meslingarnir gingu. Soleiðis vóru meslingarnir eisini orsøk til, at minni kom burturúr, enn roknað varð við.

Rentukamarið helt, at kostnaðurin av royndunum hesi bæði árini var so stórur, at *„vi finder Fiskeriers Vedbliven betænkelig.“* Umframt skuldina í Einahandilsins kassa á 2766 ríkisdálar frá royndunum hjá „Seyen“ í 1844, vórðu nú 21.327 ríkisdálar og 79 skillingar brúktir. Til royndirnar hoyrdu gott nokk 3 skip við útgerð og eitt pakkhús og lending í Føroyum, har tað eisini lógu 479½ tunna av liverpoolsalti og proviantur, men embætismenn í Rentukamarinum roknaðu kortini við, at endaligi kostnaðurin av hesum royndunum fór at gerast áleið 12.000 ríkisdálar.

At halda fram við fiskiroyndunum og vóna, at tær skuldu fara at geva vinning og soleiðis vinna útreiðslurnar inn aftur frá farnu árunum „forekommer os at være i det mindste i den Grad tvivlsomt“. Eitt var, at úrslitini av fiskiroyndunum vóru negativ. Verri var, at „de færøske Fiskeriers saa meget omtalte Betydning“ ikki á nakran máta var komin til sjóndar. Royndirnar hjá Skibsted prógvaðu eisini, at talan var um eina alt ov óvissa vinnu. Skibsted hevði roynt seg í hákellingaveiðu, og fyrra árið, 1845, var yvirskot, men seinna árið var „i den Grad mislykket.“

Rentukamarið helt ikki, at tað, at fronsk skip fiskaðu í stórum tali undir Íslandi og Føroyum, var nakað prógv um, at hesin fiskiskapur lønti seg, tí franska stjórnin stuðlaði sínari vinnu á ymiskan hátt fyri at eggja til henda vinnuvegin.

Niðurstøðan var tí greið. Rentukamarið helt ikki, at tað var ráðiligt at halda fram við hesum royndunum og mælti til at gevast og lata Handilsstjórnina selja skip og aðrar ognir, sum hoyrdu til royndirnar, so hon fekk dekkað nakrar av sínum útreiðslum innaftur[185]. Rentukamarið, og harvið stórur partur av miðfyrisitingini í Keypmannahavn, trúði ikki longur upp á eina føroyska fiskivinnu. Kongligu royndirnar at seta gongd á skipsfiskiskap í Føroyum vóru miseydnaðar.

## *13.3 Føroyska manningin*

Umframt at vísa á, hvussu fiskiskapur við havgangandi skipi kundi fáast at bera til í Føroyum, var eitt annað endamál við kongligu fiskiroyndunum 1844-46 at læra nakrar føroyingar upp til fiskimenn. Tað var tí alla tíðina ætlanin, at nakrir føroyingar skuldu sleppa at royna seg, meðan tey fiskaðu, og Pløyen fekk sum amtmaður boð um at finna nakrar føroyingar at fara við „Seyen“ sum manning og lærlingar.

185 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 19. februar 1847.

Tíðindini um henda møguleikan spreiddust skjótt, og seks mans meldaðu seg til at fara umborð. Teir fingu lovað eina mánaðarhýru upp á 6 ríkisdálar, og harumframt skuldu teir fáa ein ríkisdála fyri hvørjar 100 toskar, sum teir fiskaðu. Tað var minni, enn donsku skipsfelagarnir fingu, men Pløyen helt, at tað var rímiligt, tí føroyingarnir vóru óroyndir og vóru tí ikki til líka stóra nyttu á skipinum. Pløyen hevði eisini lovað teimum kost umborð. Einki stóð um tað í boðunum til sín, men tað var vanligt, at reiðaríið rindaði fyri kostin, og um ætlanin var at gera nakað annað enn tað vanliga, hevði tað helst staðið í boðunum[186].

Brøv vórðu send til teir seks menninar, sum Pløyen vildi hava við „Seyen", men tað eina brævið var komið so seint fram, at bara fimm mans vóru møttir, tá ið skipið fór av Havnini. Pløyen bjóðaði sær seinni til at fáa fatur á sætta manninum, men skiparin vildi ikki hava fleiri, tí teir høvdu longu so nógv snøri úti, at tey javnan komu í trol, tí briggin rak so illa.

Teir fimm føroyingarnir umborð bóðu um at sleppa av skipinum 2. august, tí teir vóru so illa útgjørdir við sjóklæðum og tí ikki vóru so væl fyri at taka lut í hákellingaveiðuni. Harumframt kom, at skiparin bara vildi hava tveir av teimum við til henda partin av túrinum. Báðir partar skiltust í fullari semju, og allir fimm boðaðu frá, at teir fegnir tóku av hesum møguleikanum eina aðru ferð. Pløyen fekk tveir aðrar ungar menn at fara við til hákellingaveiðuna, og teir fingu sjey ríkisdálar í hýru um mánaðin, tí teir høvdu so at siga ongan møguleika at vinna nakað við sjálvdrátti[187].

Á yvirliti yvir úrtøkuna hjá manningini sæst, at skiparin fekk 32 ríkisdálar um mánaðin, stýrimaðurin M.N. Christensen fekk 20 ríkisdálar um mánaðin, og timburmaðurin A.M. Jørgensen og teir tríggir matrósarnir fingu 12 ríkisdálar um mánaðin. Lættmatrósurin Christen Hansen fekk 10 ríkisdálar, og tríggir jungmenn fingu 9 ríkisdálar um mánaðin. Kokkurin fekk eins og teir fimm føroyingarnar 6 ríkisdálar í mánaðarløn, og drongurin umborð Chr. F. Lillelund fekk 5 ríkisdálar um mánaðin. Allir fingu teir 1 ríkisdála fyri hvørjar 100 fiskar. Føroyingarnir fingu 16 ríkisdálar og 38 skillingar hvør fyri teir 2 mánaðirnar og 22 dagarnar, sum teir vóru við skipinum, og teir fiskaðu millum 788 og 982 toskar, so samlaða lønin hjá teimum lá millum 24 ríkisdálar og 26 skillingar og 26 ríkisdálar og 20 skillingar. Føroyingarnar, sum vóru við fyrra partin av túrinum, vóru Knút Jacobsen og Jacob Hansen frá Gjógv, Jacob Hansen og Hans Petur Olsen av Eiði og Johs. Michael Hans Pedersen úr Havn. Á hákellingaveiðu vóru Hans Pedersen úr Nólsoy og Hans Pauli Joensen úr Havn (Degn 1929: 38–41).

Carl Irminger tosaði við Johansen skipara um føroyingarnar umborð, tá ið hann var í Føroyum, og hann segði, at føroyingar sum fiskimenn vóru langt aftanfyri, men eftir stuttari tíð komu teir á lagið, tí teir vóru „raske, opvakte, nøisomme og haardføre Folk". Føroyingarnir umborð vóru allir „særdeles tilfredse", sjálvt

186 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 42. Bræv til Rentukamarið dagfest 8. mai 1844.
187 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 120. Bræv til Rentukamarið dagfest 16. september 1844.

*Eitt av endamálunum við kongligu fiskiroyndunum var at læra nakrar føroyingar at vera við fiskiskipi. Hesa myndina málaði Frederik Theodor Kloss á Føroyaferðini hjá krúnprinsinum í 1844. (Mynd: Tjóðsavnið 6790F04)*



um hýran var lægri enn hjá øðrum matrósum. Orsøkin var, at maturin umborð var góður, og so var lívið umborð nógv lættari enn at rógva út[188].

### 13.3.1 Fyrsta fiskimannaverkfallið í føroyskari søgu

Meðan eingir trupulleikar vóru av føroysku manningini í 1844, gekk tað meira dramatiskt fyri seg í 1845. Tað árið visti Pløyen ikki av, at ætlanin var at halda fram við fiskiroyndunum, fyrr enn fyrstu skipini komu úr Danmark. Tí náddi hann ikki at fáa fatur á øllum teimum føroyingunum, sum ætlanin var at fáa umborð á skipini, tá ið tey komu síðst í apríl. Ætlanini var, at seks mans skuldu fara við hvørjum skipi, men endin gjørdist, at fimm mans fóru við jaktunum báðum, og fýra fóru við sluppini.

Teir føroyingarnir, sum vóru við árið fyri, kravdu at fáa hægri hýru nú, tí teir gjørdu størri nyttu enn teir nýggju menninir. Pløyen tók undir við hesum og avgjørdi, at teir skuldu hava ein ríkisdála meira enn teir nýggju menninir, sum fingu 6 ríkisdálar um mánaðin[189]. Seinni vóru helst 6 mans við hvørjum skipi, tí Pløyen boðaði frá, at hann hevði fingið fatur á fullari manning[190].

Vit kenna ikki nøvnini á øllum hesum føroyingunum, men Hans Pauli Joensen, sum hevði verið við árið fyri, og Mikkjal Joensen í Kristnastovu vóru við „Hanne

188 Berlingske politiske og Avertissements-Tidende nr. 316 frá 21. november 1844. Grein nevnd „Fiskerierne ved Færøerne".
189 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 248. Bræv til Rentukamarið dagfest 14. mai 1845.
190 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 262. Bræv til Rentukamarið dagfest 28. juni 1845.

& Marie“, Poul Johs. Michelsen, uppsitari á amtmansgarðinum í Álakeri, var við „Karen Knuth“, og Augustus Sivertsen, Joen Anthoniussen og Johs. Michael Petersen vóru við „Jylland“ (Nolsøe og Jespersen 2009: 320).

Helst vóru umstøðurnar umborð á stóru briggini „Seyen“ betri enn umborð á hesum smærru skipunum, sum nú royndu seg, tí tá ið jaktin „Hanne & Marie“ var inni av fyrsta túri, vildu tveir ungir suðringar sleppa av skipinum. Teir søgdu seg vera sjúkar, og Pløyen fekk teir ikki til at koma við aðrari frágreiðing. Hann læt teir mynstra av skipinum, tí hann „anseer Tvang for at være aldeles uhensigtsmæssigt, naar man ønsker at nærme Færingerne til Søelivet.“ Tveir aðrir mans bjóðaðu seg skjótt til at fara við í staðin.

Seinni kom undan kavi, at tað var misnøgd við matin og umstøðurnar umborð, sum hevði fingið suðringarnar at vilja sleppa í land aftur. Tí fór Pløyen umborð á „Hanne & Marie“, tá ið skipið kom á Havnina aftur, at práta við Petersen skipara og fyri at kanna umstøðurnar umborð. Pløyen ásannaði, at fyri føroyingar vóru umstøðurnar umborð ógvuliga vánaligar, „næsten at kalde uforsvarlige“, tí talan var bara um koyggjur í lastini beint við fiskastakkin, sum var vátur av saltlakanum, og koyggjur og fiskur vóru ikki nóg væl atskild. Føroyska manningin klagaði upp á tað harðasta um hesi viðurskifti og um kostin umborð, og allir uttan ein kravdu at sleppa at mynstra av.

Pløyen kannaði málið og kom skjótt fram til, at báðir partar høvdu sínar feilir. Føroyingarnir høvdu eftir øllum at døma blakað breyð fyri borð, tí teir hildu tað ikki vera etandi. Teir áttu at havt víst skiparanum breyðið, tí at blaka tað fyri borð var at gera seg inn á ordanin á skipinum. Skiparin revsaði teir við at seta rationering upp á breyðið, men Pløyen helt, at best hevði verið at sæð mildari upp á hesa gerð, tí talan var hóast alt um óroyndar menn, sum vóru við sum lærlingar. Hann hevði fleiri ferðir greitt skiparunum frá, at teir „blandt Færingerne kunne udrette Alt med Mildhed men Intet med Strenghed.“

Ein av klagunum hjá føroyingunum var, at teir fingu smærri portiónir enn donsku matrósarnir. Pløyen staðfesti, at „denne meget væsentlige Klage var desværre! sandfærdig.“ Av misskiltari økonomi, sum kundi vera vælmeint, hevði Petersen skipari skorið ¼ pund av kjøti av ratiónunum hjá hvørjum føroyingi og á tann hátt økt um munin, sum longu var „betinget af Nationaliteten og vedligeholdt ved den Omstændighed, at de Danske udelukkende have brugen af det saakaldte Lukaf, medens Færingerne maa ligge i Lasten.“ Pløyen læt teir ónøgdu føroyingarnar mynstra av, men hann fekk ikki fatur á fullari manning aftur. Rúmið til føroyingar gjørdi hann í stand, so væl sum tað bar til, og klæddi tað við máttum, so at trekkurin skuldi hvørva. Skiparin fekk eisini boð um, at eingin munur í framtíðini skuldi gerast á føroyingum og dønum viðvíkjandi kostinum umborð. Alt hetta gjørdi hann uttan boð ella loyvi frá hægri myndugleika í vónini um at steðga ósemjunum. Hann vónaði, at Rentukamarið tók undir við stigunum, sum hann hevði tikið.

Av tí at eitt av stóru endamálunum við hesum fiskiroyndunum var at fáa føroyskar lærlingar umborð, loyvdi Pløyen sær at koma við nøkrum viðmerkingum um umstøðurnar umborð hjá lærlingunum. Nú vóru skipini av teirri røttu støddini til fiskarí, men tey vóru bara ætlað til eina manning á 5 til 6 mans, tá ið skipari og stýrimaður vóru íroknaðir, og tí endaðu føroyingarnir í lastini. Tað kundi gingið, um umstøðurnar í lastini vóru góðar, men tað vóru tær ikki, og atskiljingin av føroyingum og dønum gav ein keðiligan hýr umborð, sum var lítið ynskiligur. Allur maturin var gjørdur í lugarinum, men tá ið føroyingarnir vóru fyri seg í lastini, var so skjótt at teir fóru at fáa illgruna um, at teir bæði fingu verri og minni kost enn hinir. Tað var eisini óheppið, at føroyingar ikki fingu atgongd til eldstaðin á síni frívakt til at hita seg ella til at turka klæðir, men noyddust at leita sær í lastina at hvíla seg í fukti og trekki. Ein loysn var at innrætta lugarið av nýggjum, so øll manningin fekk pláss har. Tá fór sjálvandi nakað av lastrúminum, men skipini vóru gjørd til at fiska við, og til tað var lastin nóg stór, og „den færøiske Besætnings Velvære og gode Stemning forekommer mig at være en meget væsentlig Betragtning.“[191]

### 13.3.2 Royndi at fáa føroyingar umborð á herflotan

Tað eydnaðist hjá føroysku manningini at fáa betri umstøður umborð við at mótmæla, men stórt meira kom ikki burturúr, tí árið eftir fingu føroyingarnir meslingar, so skipini noyddust at sigla til lands við teimum, so teir kundu fara á hospitalið[192]. Kortini sigur Anton Degn í bók síni, at tveir av føroyingunum vóru teir, sum fiskaðu mest í 1846, og at tann besti av teimum fiskaði meir enn 1500 fiskar (Degn 1929: 44).

Meir enn tað fæst ikki at vita úr keldutilfarinum, men tá ið Rentukamarið tók saman um royndirnar av hesum trimum árunum við royndarfiskiskapi, var niðurstøðan, at „Færingernes Belæring i Havfiskeri er ei heller opnaaet ved Fiskeriforsøget.“ Hví Rentukamarið kom til hesa niðurstøðu er eitt sindur ógreitt, tí einasta frágreiðingin, sum Rentukamarið kom við, var, at leikluturin hjá føroyingunum hevði alla tíðina verið lítil, og teir vóru so bundnir til útróðurin, at tað var torført at venja teir til nakað annað. Í einum broti, sum er strikað út, skrivaði Rentukamarið kortini, at føroyingurin sjálvt undir fríum handli við skipsfiskiskapi fór at verða bundin at handilsfeløgum, og onkursvegna man Rentukamarið hava hildið, at hesin bundinskapur fór at gagnast illa, tí tað helt, at føroyingar tí heldur fóru at velja at halda fram við útróðrinum, har til bar at nýta røttu løtuna at fiska, „uden at afgive noget af deres Selvstændighed.“[193] At grundgevingin hjá Rentukamarinum um, hví royndin at fáa føroyingar at fiska við skipi var miseydnað, var so ógreið, komst uttan iva av, at avgerð longu var

191 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 262. Bræv til Rentukamarið dagfest 28. juni 1845.

192 TSS. Færø Amt. Kopibok Ø, bræv nr. 87. Bræv til Rentukamarið dagfest 26. oktober 1846.

193 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 19. februar 1847



*Pløyen amtmaður skaffaði Zahrtman kommandørkapteini seks ungar føroyingar, sum kundu fara við flotanum at gera uppmátingar undir Íslandi. Menninir høvdu allir verið við kongligu fiskiskipunum, og endamálið var at menna eina føroyska sjóvinnu. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

tikin um at steðga við fiskiroyndunum, og tað bar illa til samstundis at vísa til góð úrslit av royndunum.

Pløyen amtmaður var neyvan samdur í áskoðan Rentukamarsins, tí hann var alla sína tíð í Føroyum áhugaður í at fáa føroyingar upplærdar til sjómenn. Eitt dømi um tað sást, tá hann fekk bræv frá kamarharranum Zahrtman kommandørkapteini, sum vildi hava nakrar føroyingar við sær, tá ið hann fór at gera uppmátingar undir Íslandi í 1848 og 1849. Tað vóru kærkomin boð, tí Pløyen hevði júst tá avgjørt at leggja uppskot fram um, at nakrir ungir føroyingar skuldu fáa pláss á skipum í kongsins flota. Hetta uppskotið ætlaði hann at arbeiða fyri, tá ið hann fór til Danmarkar seinni í 1847. Pløyen greiddi Zahrtman frá, at føroyingar vóru sum skaptir til sjólívið, og teir fóru eftir stuttari tíð at gerast dugnaligir matrósar. Nú hildu teir seg heldur ikki aftur longur, tí nú vistu teir, hvussu væl matrósar á kongsins flota vóru viðfarnir.

Pløyen gjørdi tí skjótt av. Hann fann seks ungar menn, sum vildu fara við Zahrtman, og hann var vísur í, at hetta vóru góðir menn. Pløyen nýtti høvi til at minna á, at ymisk viðferð av dønum og føroyingum kundi fáa fram „en uhyggelig Stemning“ og gera tjóðskaparliga munin alt ov týðiligan. Hesir seks ungu menninir høvdu allir verið við skipunum, sum fiskaðu fyri kong, og tí vóru teir førir fyri at átaka sær alt matrósarbeiði umborð á eini jakt. Tveir av teimum høvdu verið við øll trý summarini.

Pløyen ivaðist í, um hann var farin ov skjótt til verka við at finna manning til Zarthman, men hann umbar seg við, at hann við næsta skipi ætlaði at fara

til Danmarkar, og „Sagen interessere mig i den Grad“, at hann fegin vildi seta føroyingarnar í starv, áðrenn hann fór. Ein orsøk var, at hann „gjerne vil selv vælge Folkene, for at bidrage Mit til, at det første saa vigtige Forsøg kunde udfalde heldigt.“

Pløyen endaði brævið við at umbera seg fyri at vera so framligur, men hann „anseer denne Sag for at være af saa megen Betydning for mange flere Færinger end netop for dem, der muligen vil komme til at deltage i ovenbemeldte Tur, og griber derfor begærligen Anledningen til at udtale mig om de Spørgsmaal, der frembyde sig.“[194]

Ætlanin var sostatt, at nakrir av teimum, sum høvdu fingið royndir umborð á kongligu fiskiskipunum, skuldu gagnnýta tær til at vinna sær víðari royndir á øðrum skipum. Betri prógv enn tað fæst valla fyri, at nakað gott kom burtur úr tí partinum av fiskivinnuroyndunum, sum snúðu seg um at læra føroyingar um sjólívið. Tíverri er tøka keldutilfarið tigandi um, hvat víðari hendi við hesi ætlanini, og tí eru sannlíkindini størst fyri, at ætlanin varð slept, og ein orsøk kann hava verið, at Pløyen amtmaður fekk nógv annað at hugsa um, tá ið hann fór av landinum á heysti 1847.

## *13.4 Klippfiskavirking í Álakeri*

Upprunaliga endamálið við kongligu fiskiroyndunum við Føroyar var at kanna møguleikarnar at fiska og at læra nakrar føroyingar upp til fiskimenn. Klippfiskavirking sæst ikki at hava verið partur av endamálinum, men tað var ein fortreyt fyri fiskiskapi við deksførum, at fiskurin kundi saltast og virkast til klippfisk. At tað gjørdist júst hesin parturin av fiskiroyndunum hjá kongi, sum fekk størstan týdning fyri framtíðar føroyska fiskivinnu, var tí meira ein tilvild enn ein tilætlað hending. Talan var um eitt dømi um „unintended consequences“, har klippfiskavirkingin upprunaliga var partur av ein roynd at fáa føroyingar áhugaðar í skipsfiskiskapi. Tann ætlanin var slept og hildin at vera miseydnað, men áðrenn hon varð slept, høvdu føroyskir útróðrarmenn tikið møguleikan til sín. Teir vóru farnir at avreiða ráfisk til virkingar, og tað skuldi vísa seg at verða ein avgerandi liður í at loysa útróðurin úr gamla bóndasamfelagnum og gera hann vinnuligan. Nøkur áratíggju seinni kom endiliga gongd á skipsfiskiskapin, og tað vóru tá í stóran mun útróðrarmenninir, sum nýttu royndir sínar at menna fiskivinnuna víðari.

### 13.4.1 Holger Jacobæus virkar fisk í Álakeri

Tá ið Clausen skuldi finna onkran royndan mann at standa fyri klippfiskavirkingini í Føroyum, valdi hann at seta Holger Jacobæus í starv, og Jacobæus fekk 28. mars 1844 skrivlig boð um, hvør hansara uppgáva fór at verða. Í boðunum

194 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 179. Bræv til Kommandørkaptein Zahrtman dagfest 20. juni 1847.

stóð, at Jacobæus skuldi fáa boð frá Pløyen amtmanni um, hvar fiskavirkingin kundi vera, og hann skuldi tryggja sær, at staðið var væl egnað og hevði hóskandi hellu til at breiða fiskin á og til at pressa hann. Staðið skuldi eisini hava hóskandi sólargang, og í illveðri skuldi helst eingin vandi vera fyri, at sandur feyk á fiskin. Umborð á „Seyen“ vóru mottur og bretti til fiskavirkingina, og fyrstu ferð, „Seyen“ landaði, skuldi manningin taka sær av at vaska fiskin, men tá skuldi Jacobæus eisini læra nøkur havnarfólk at vaska og virka fisk, so at „Seyen“ ikki kom at liggja óneyðuga leingi í havn, aðru ferð teir landaðu. Jacobæus fekk boð um at virka fiskin so væl, at hann ikki var verri enn tann íslendski klippfiskurin. Í virkingini skuldi Jacobæus dagliga skriva niður nøvnini á arbeiðsfólkunum, og hvussu stór teirra dagløn var (Nolsøe 1984: 264–265).

Pløyen helt, at eitt stað til klippfiskavirking bæði skuldi hava góðar natúrligar umstøður at virka fiskin og liggja soleiðis fyri, at tað alla tíðina bar til at fáa nóg nógv fólk til arbeiðið. Harumframt var neyðugt at hava góðar umstøður til at lossa og lasta. Hann vildi kortini ikki velja nakað stað, fyrr enn hann hevði fingið umrøtt spurningin við Johansen skipara og fiskavirkaran Jacobæus, sum vóru við „Seyen“[195].

Tá ið „Seyen“ kom á fyrsta sinni, fingu Pløyen og Jacobæus umrøtt spurningin um eitt stað, og Jacobæus valdi at leggja klippfiskavirkingina úti í Álakeri. Tað dámdi amtmanninum væl, tí fyri hann var tað „mig særdeles kjært, da jeg saaledes har kunnet have stadigt Tilsyn med hans Virksomhed, der hidtil har været upaaklagelig.“ Álaker var partur av bønum á embætisgarði amtmansins, so har ráddi hann einsamallur.

Skjótt kundi amtmaðurin staðfesta, at fiskurin sá út til at gerast heilt góður klippfiskur, sjálvt um veðrið ikki hevði verið til vildar til virkingina. Pløyen fekk fatur á nøkrum havnarmonnum, sum skuldu læra seg at taka lut í virkingini, og Jacobæus og tríggir royndir menn av skipinum løgdu teimum lag á, meðan restin av manningini landaði fiskin. Tí kundi „Seyen“ fara út aftur tveir dagar eftir, at hon var komin inn[196].

Á veg til Íslands var H.A. Clausen í Havn í nakrar dagar í juni, og hann fegnaðist eisini um plássið, sum teir høvdu valt til klippfiskavirkingina, men hann helt, at veiðan var eitt sindur minni, enn hann hevði roknað við. Úr Havn var Clausen farin til Vestmannar og Sørvágs at kanna umstøðurnar har[197].

„Seyen“ landaði um ólavsøkumundið fyri síðstu ferð tosk til virkingar, og tá vóru umleið 13.600 fiskar avreiddir, og teir góvu góð 118 skippund av klippfiski. Samanlagt var útreiðslan av hesum partinum góðar 200 ríkisdálar. Tey, sum arbeiddu í fiskinum, fingu sína løn útgoldna á kontórinum hjá amtmanninum eftir notu, sum Jacobæus hevði skrivað[198].

---

195 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 42. Bræv til Rentukamarið dagfest 8. mai 1844.
196 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 63. Bræv til Rentukamarið dagfest 17. juni 1844.
197 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 63. Bræv til Rentukamarið dagfest 17. juni 1844.
198 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 120. Bræv til Rentukamarið dagfest 16. september 1844.



*Jacobæus valdi at leggja klippfiskavirkingina í Álakeri, og tað dámdi amtmanninum væl, tí Álaker var partur av bønum, sum hoyrdi til amtmansgarðin.*
*(Mynd: Tjóðsavnið 8063F000031)*

Tá ið Pløyen tók saman um og greiddi frá tí, sum kom burtur úr royndarfiskiskapinum hjá „Seyen" í 1844, segði hann, at klippfiskavirkingin í Ákakeri dyggiliga hevði víst, at áhaldandi pástandir um, at veðurlagið í Føroyum ikki var tað rætta til slíka virking, ikki passaðu. Pløyen ivaðist ikki í, at hesin klippfiskurin var vøkur og væl hagreidd handilsvøra. Í Havn høvdu mangar kvinnur og børn hetta summarið fingið eina inntøku í fiskavirkingini. Tað var ein nýggjur møguleiki hjá teimum, og tey vóru ógvuliga kedd, tá ið virkingin helt uppat, og longdust, til gongd kom á aftur næsta ár.

Tá ið „Seyen" fór av landinum aftur, fylti klippfiskurin bara ein part av lastini. Tí tók Pløyen stig til at fylla restina av lastini upp við nakað av tí nógva turra fiskinum, sum handilin hevði á lagri. Handilsins skip megnaðu ikki at flyta allan fiskin, og tí vóru øll pakkhús full. Tað var ein avleiðing av, at turri fiskurin var vorðin meira áhugaverdur sum vinnuframleiðsla, sum greitt er frá í 11. kapitli.

### 13.4.2 Føroyingar fáa møguleika at avreiða ráfisk

Væleydnaða klippfiskaframleiðslan í 1844 gjørdi, at Pløyen amtmaður fekk eitt hugskot, sum kom at fáa stóran týdning fyri menningina av einari fiskivinnu í Føroyum. Tá ið hann skrivaði frágreiðing sína um fiskiroyndirnar í 1844 helt Pløyen, at um ætlanin var at halda fram, so hevði verið ynskiligt, um fiskavirkarin

eisini fekk loyvi til at keypa fisk frá føroyingum fyri ein hampiligan prís, sum hann so kundi virka til klippfisk. Fiskur fiskaður við deksførum kundi ikki virkast til annað enn klippfisk, men føroyingar vóru útistongdir frá sjálvstøðugari luttøku í slíkari vinnu, so leingi sum atgongd ikki fekst til at selja klippfiskin til aðrar enn Einahandilin, tí frá honum fingust bara 10 ríkisdálar fyri hvørt skippund av klippfiski. Tí var umráðandi, um ætlanin var at gera fleiri fiskiroyndir komandi ár, at fiskaframleiðarin fekk møguleika at keypa feskan fisk frá føroyingum fyri t.d. 1 skilling fyri pundið.

Einum slíkum møguleika høvdu føroyingar leingi longst eftir, tí við einari slíkari skipan bar til at fáa vinningin av fiskinum beinanvegin, heldur enn at skula stríðast við at virka fiskin. Nógv tíð fór til turkingina, sum annars kundi verið nýtt til at fiska í, og áðrenn turri fiskurin kundi avreiðast, var vandi fyri, at virkingini miseydnaðist, og at fiskurin tí varð vrakaður.

Pløyen ivaðist ikki í, at um fiskurin í Danmark ella á øðrum marknaði fór fyri 20 ríkisdálar fyri skippundið, fór tað at geva yvirskot til framleiðaran. Føroyingar fóru at góðtaka 1 skilling upp á pundið, tí tað merkti, at teir fingu 3 ríkisdálar og 32 skillingar fyri skippundið av feskum fiski. Trý skippund av feskfiski fór til at framleiða eitt skippund av klippfiski. Feski fiskurin til eitt skippund av klippfiski kostaði tí 10 ríkisdálar, og vórðu framleiðslukostnaðirnir settir til 4 ríkisdálar, so stóð fiskurin í 14 ríkisdálum fyri skippundið, tá hann fór av landinum[199].

H.A. Clausen sendi eisini eina frágreiðing inn til Rentukamarið um royndirnar, og hansara frágreiðing samsvaraði í høvuðsheitum við frágreiðingina hjá Pløyen. Hann hevði kortini eina viðmerking til kostnaðin av virkingini, sum var vorðin heldur høgur, av tí at neyðugt var at hava ein fiskavirkara í starvi til eina so lítla nøgd av fiski. Arbeiðslønin var eisini lutfalsliga høg í Føroyum, tí fólk vóru ikki von við fiskaarbeiði, og tí kom ikki líka nógv burtur úr lønini sum í Íslandi. Fyri Clausen var eitt tað týdningarmiklasta úrslitið av royndunum í 1844, at „man har endvidere nu erholdt Vished om, at Klipfisk, endog af det fortrinligste Slags, kan tilvirkes paa Færøe, hvorom Salgspriserne paa den iaar hjembragte Fisk vidne." Prísurin á føroyska fiskinum var fleiri ríkisdálar hægri fyri skippundið enn prísurin á íslendskum fiski[200].

Irminger gjørdi eisini nógv burtur úr hesum møguleikanum í fyrilestri sínum. Hann helt, at tað var „paafaldende, at der paa Færøerne hvor Havet dog er saa fiskerigt, ikke existerer et eneste Salteri, hvortil Færingerne kunde aflevere „raa" Fisk." Hann helt, at um útróðrarmenn fingu møguleikan at landa ráfisk, so kundu teir beinanvegin rógva aftur á miðini heldur enn at stríðast við fiskin sjálvir. Harumframt vísti hann á, at nógvur summarfiskur fór til spillis, sum kundi verið gagnnýttur, um møguleiki var fyri at avreiða hann. Hesin møguleikin

199 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 120. Bræv til Rentukamarið dagfest 16. september 1844.

200 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 7. januar 1845.

var bæði í Hetlandi og í Íslandi, og hann ivaðist ikki í, „at Fiske-Udførselen fra Færøerne, ved denne velgjørende Forandring, som uden Vanskelighed lod sig iværksætte, vilde tiltage betydeligt til Fordeel for den kongelige Handel.“ At styðja sín pástand vísti hann á, at so at siga eingin fiskur varð avreiddur úr Suðuroy, áðrenn handilin á Tvøroyri kom, og orsøkin var, at tað var so torført at flyta fiskin í opnum bátum so langa leið. Nú avreiðingarmøguleikarnir vóru bøttir, var fiskaríið vaksið[201].

Rentukamarið tók spurningin upp og vendi sær fyrst til Handilsstjórnina. Handilsstjórnin greddi frá, hvørjum fiskavørum handilin arbeiddi við. Talan var um ráskornan tosk, longu og plattfisk, sum serliga var virkaður toskur. Tey bæði fyrru vóru virkað sum vanligur turrur fiskur, sum varð klovin, ryggurin tikin úr, og fiskurin vaskaður og hongdur upp. Plattfiskur var eitt millumting millum turran fisk og klippfisk. Hann varð virkaður við at liggja í press millum stein og bretti, næstan sum klippfiskur, men hann var ikki saltaður, men dyppaður í sjógvi. Plattfiskur varð bara virkaður ta tíðina á árinum, serliga í august, tá ið stilt veður við hita og mjørka gjørdu tað torført at virka ráskornan fisk. Henda virking var serliga í teimum bygdum, har hitin var mestur. Ráskorni toskurin gav nógv hægsta prísin, og tað var eisini serliga henda vøra, sum varð framleidd. Eingin fiskur fekk so góðan prís sum „færøske Rodtskjær“. Virkingin av klippfiski var nógv meira arbeiðskrevjandi og kostaði nógv í salti, og tað gjørdi ráskorin toskur ikki. So sjálvt um 4 skippund av ráfiski fóru til hvørt skippundið av turrum ráskornum fiski, meðan bara 3 skippund fóru til eitt skippund av klippfiski, so fór virkingin av „rodtskjær“ framvegis at geva íbúgvunum meira enn virkingin av klippfiskinum, tá ið veðrið ikki var nøkur forðing.

Handilsstjórnin var tí ikki fegin um at missa hesa vøru, og Rentukamarið tók undir við, at klippfiskaframleiðslan ikki skuldi ganga út yvir útflutningin av turrum fiski. Tí vildi tað avmarka tíðina, tikið varð ímóti ráfiski, til ta tíðina, tá ið tað var torført at turka fisk. Harumframt skuldi ráfiskur bara avreiðast beinleiðis til fiskavirkaran í Havn. Við hesum avmarkingum, var Handilsstjórnin sinnað til at lata fiskavirkaran taka ímóti fiski fyri handilsins rokning.

Handilsstjórnin hevði skotið upp, at prísurin skuldi vera 1 skillingur fyri pundið, og tað var júst tað sama, sum Pløyen hevði skotið upp. Handilsstjórnin hevði viðmerkt, at tað møguliga fór at verða torført at halda fiskin frá kongligu skipunum og útróðrarfiskin atskildan, men tað helt Rentukamarið vera neyðugt, tí talan kundi gerast um ymiska góðsku. Amtmaðurin og handilsforvaltarin skuldu skipa arbeiðið soleiðis, at bland ikki kom í. Hetta var grundarlagið undir resolutiónini, sum kongur undirskrivaði 21. februar 1845. Sjálv resolutiónin var soljóðandi:

> Vi ville allernaadigst, at Fiskeberederen, der medfølger den Fiskeri-Expedition, som ifølge Vor Resolution af 7. Januar dette Aar opsendes til Færøerne,

201 Berlingske politiske og Avertissements-Tidende nr. 316 frá 21. november 1844. Grein nevnd „Fiskerierne ved Færøerne“.



*21. februar 1845 varð avgerð tikin um, at fiskavirkarin kundi taka ímóti ráfiski frá føroyskum útróðrarmonnum.*

> efter nærmere Instruction, som vil være at meddele ham af Amtmanden og Handelsforvalteren, for det første iaar for den Kongelige færøske Handels Regning afkjøber Færingerne raa Fisk mod Betaling af 1 sk. pr Pund, for at virke den til Klipfisk, imod at Handelen forholdsviis iagttager Expeditionen Virkningsomkostningerne, dog at Modtagelsen af saadan Fisk indskrænker sig til den Aarstid, da den vanskeligere lader sig virke til Rodtskjær, og forsaavidt den kan leveres Fiskeberederen i Thorshavn[202].

Clausen skuldi bera hesi boðini víðari til fiskavirkaran, og Handilsstjórnin hevði eisini fingið boð, so hon kundi geva Nolsøe handilsforvaltara neyðugu boðini. Stjórnin skuldi eisini halda eyga við, hvussu nógvur fiskur varð landaður, og ansa eftir, at 1 skippund av klippfiski kom burtur úr hvørjum trimum skippundum av ráfiski. Amtmaðurin og handilsforvaltarin skuldu skipa fyri á staðnum, so til bar at virka fiskin. Handilin skuldi taka útreiðslurnar av framleiðsluni á seg,

202 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 21. februar 1845.



*Tá ið kongligu fiskiskipini komu aftur í 1845, høvdu tey timbur til eitt pakkhús við sær. Pakkhúsið gjørdist miðdepil í klippfiskavirkingini í Havn fyrstu mongu árini. (Mynd: Tjóðsavnið 4590F100)*

og hann skuldi eisini gjalda føroyingum fyri tann fiskin, sum teir avreiddu. Tá ið fiskurin var liðugt framleiddur, skuldi hann latast til handilsforvaltaran[203].

**13.4.3 Virkingin 1845 og 1846**

Tá ið tað var greitt, at royndir eisini skuldu gerast í 1845, varð Jacobæus aftur settur sum fiskavirkari á ferðini. Hann fekk hesa ferð 600 ríkisdálar í ársløn og 24 skillingar fyri hvørt væl framleitt skippund av klippfiski[204].

Eitt pakkhús varð bygt til fiskiroyndirnar í 1845. Skipini „Hanne & Marie“ og „Jylland“ høvdu timbur við sær til pakkhúsið, tá ið tær komu á Havnina 29. apríl. Saman fóru Pløyen, Jacobæus og Jákup Nolsøe at finna besta plássið til pakkhúsið. Teir valdu „et Sted paa Strandbredden af min Embædsgaards Grund, ved en liden bugt, hvor der er godt at lande og omgivet af de Sker, som benyttes til Fiskevirkningen.“ Longu 14. mai var grundin til pakkhúsið liðug, og dagin eftir fóru timburmenninir í gongd við sítt arbeiði. Vónin var, at bygningurin var liðugur, tá ið skipini komu inn aftur av fyrsta túri[205].

Clausen hevði stórar ætlanir í 1845. Í brævi til Pløyen hevði hann sagt, at tað var týdningarmikið, at alt strandarøkið í Havn heilt av Glyvursnesi og út

203 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra Q, bræv nr. 91. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannin dagfest 22. mars 1845.

204 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 19. februar 1847.

205 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 248. Bræv til Rentukamarið dagfest 14. mai 1845.



*Longu í 1845 sá H.A. Clausen fyri sær, at brúk bleiv fyri allari strondini av Skansanum og heilt út á Glyvursnes til klippfiskaturking. So stóran tørv fekk fiskivinnan neyvan nakrantíð á strandarøki, men vinnan var ikki gomul, tá ið allar hellur kring Havnarvág vórðu gagnnýttar at turka fisk á. (Mynd: Tjóðsavnið 249F06)*

á Skansan, sum kundi nýtast til at landa fisk á, varð lagt av til fiskiroyndirnar. Pløyen skuldi práta við Clausen um hetta, tá ið hann kom til Føroya, men Pløyen boðaði kortini Rentukamarinum frá, at hann helt tað var at taka í so rívan til. Tað var púra óneyðugt at fara at samráðast við festarar og ognarar um tað, tí besta staðið var jørðin, sum hoyrdi til garðin hjá amtmanni í Álakeri, og tað kundi bara gleða hann, um fiskiroyndirnar fingu brúk fyri allari fjøruni har. Hellan undir Skansanum lá til Húsagarðsfestini, so hon kundi lættliga fáast til royndirnar. Strondin úr Sandagerði og út á Glyvurnes var lutvíst kirkjujørð, festijørð og ognarjørð, men um tað gjørdist neyðugt, skuldi Pløyen seta seg í samband við prest, kirkjubøbøndur og argjamenn. Fyri fyrst var Pløyen glaður fyri, at alt arbeiðið kundi gerast á hansara egnu jørð, tí so slapst undan at krevja nakað av øðrum. Pløyen loyvdi sær fyri almennan pening at gera eina gøtu gjøgnum bøin hjá sær, um tað skuldi víst seg, at fólk til og frá arbeiði í Álakeri fóru at ganga hvør sína leið gjøgnum bøin[206].

Veðrið í 1845 var hildið at gera, at lítið var at fáa hjá teimum trimum skipunum, og veðrið var eisini ein avbjóðing hjá fiskavirkaranum í Álakeri, tí tað regnaði sera illa alt summarið. Tað gjørdi virkingina torføra, og tí kostaði hon meira enn ætlað. Pløyen segði seg ikki minnast so nógv regn tey 15 árini, hann hevði verið í Føroyum, men tá ið tað undir so vánaligum umstøðum kortini eydnaðist at

206 Ibid.

virka fiskin til 150 skippund av góðum klippfiski, so var tað endaliga prógvað, at veðurlagið í Føroyum ongantíð fór at gerast ein forðing fyri hesi ídnaðargrein[207].

### 13.4.4 Stórur áhugi at avreiða

Boðini um at takast kundi móti ráfiski í Havn, fingu Pløyen at gera eina reglugerð, sum Nolsøe handilsforvaltari tók undir við og skrivaði undir. Hesar reglur fekk Jacobæus at halda seg til[208]. Frá fyrst í juni til 28. juni tók Jacobæus ímóti 600 lispundum av ráfiski, men hann hevði kunnað fingið væl meir, um veðrið ikki gjørdi, at hetta var ein vánaligur mánaður til útróður. Síðst í juni var tíðin komin til, at summarfiskurin kom undir land, og tí var vónin, at útróðrarmenn fóru at landa væl meir í juli og august[209].

Tann vónin helt, tí áhugin hjá føroyingum at avreiða til klippfiskavirkingar í Havn var nógv størri longu hetta fyrsta árið, enn roknað hevði verið við. 2579 lispund av ráfiski vóru avreidd til Jacobæus og hansara fólk, og fiskur kom ikki bara frá havnarmonnum og nærmastu bygdunum, tí bátar úr Sandoynni, Tjørnuvík og Eiði avreiddu eisini. Sjálvt um hesar bygdir lógu langt burturi, so gjørdu teir ferðina bara fyri at avreiða, so áhugin var sera stórur. Sostatt var helst eingin ivi longur í, at hesin møguleikin samsvaraði við ynski og tørv hjá føroyingum[210].

Virkingin av fiskinum frá royndarskipunum gav 154 ¾ skippund í 1845, sum fóru við donsku skipunum, og 30 skippund, sum ikki vóru liðugt virkað, tá ið skipini fóru av landinum. Harumframt fingust 43 skippund burtur úr tí, sum útróðrarmenn landaðu til virkingar. Henda fiskin sendi Einahandilin niður við skonnartini „Hector". Fiskavirkarin skuldi sambært skrivinum 22. mars 1845 fáa eitt skippund burtur úr hvørjum 3 skippundum av ráfiski. Um nakað leyp av, so átti fiskavirkarin tað, og hann hevði megnað at fáa 10 skippund á tann hátt. Hesin fiskur var sendur fyri seg til Clausen, sum eisini fekk eina frágreiðing um, at hetta summarið hevði verið vánaligt hjá fiskavirkaranum, tí nógva regnið hevði givið stór tap. Fiskurin hjá ekspeditiónini og tann frá útróðrarmonnum skuldi haldast hvør sær, og tað varð gjørt við at merkja hvønn fisk við einum krossi í stertinum, og Pløyen, sum mestsum dagliga var á fiskastykkinum, hevði eftirlit við, at hetta varð gjørt[211].

So væl eydnaðist hetta fyrsta árið við møguleika fyri at avreiða ráfisk, at Pløyen amtmaður beinanvegin fór at hugsa um, hvussu avreiðingarmøguleikarnar kundu víðkast, soleiðis at til bar at taka ímóti fiski á fleiri støðum. Pløyen helt, at royndin skuldi víðkast, so nakrir av monnunum, sum Jacobæus hevði lært upp, kundu standa fyri móttøku, fleking og turking úti um landið. Royndarskipini kundu so

207 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 314. Bræv til Rentukamarið dagfest 16. september 1845.

208 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 248. Bræv til Rentukamarið dagfest 14. mai 1845.

209 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 262. Bræv til Rentukamarið dagfest 28. juni 1845.

210 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 314. Bræv til Rentukamarið dagfest 16. september 1845.

211 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 334. Bræv til Rentukamarið dagfest 30. oktober 1845.

við jøvnum millumbilum taka fiskin á hesum støðum og føra hann til Havnar. Hesir móttøkumenninir kring landið fóru uttan iva at kunna lønast av tí, sum fiskurin gav av sær[212].

Samskifti um henda spurning endaði við, at loyvi varð givið til, at føroyingar skuldu landa til kongligu skipini, men hesum møguleikanum var kortini lítil nytta í, og tað hevði Pløyen heldur ikki roknað við, tí tað var alt ov torført hjá róðrarbátum at landa til skip, tí bátarnir vóru so bundnir av at fylgja sjóvarfallinum. Skipararnir ásannaðu, at sjálvt um teir høvdu pening umborð, so hevði ikki ein einasti bátur vent sær til teirra fyri at avreiða. Ein onnur orsøk kundi vera, at toskurin sambært Johansen skipara á „Karen Knudt" var mestur á kantinum, har Landgrunnurin endaði, og so langt út komu róðrarbátar ikki. Tí mælti Pløyen til at steðga við at taka ímóti á skipunum, men at halda fram við móttøku á landi og víðka hana til fleiri støð[213].

Í 1846 forðaðu meslingarnir fyri, at líka nógv varð róð út, sum eitt vanligt ár, men kortini vóru 4910 fiskar avreiddir, og teir vórðu virkaðir til góð 39 skippund av klippfiski. Sjálvt um eingin framgongd var í avreiðingunum, so fegnaðust útróðrarmenn um henda møguleikan, og teir bóðu Pløyen so inniliga heita á myndugleikarnar um, at hann slapp at halda fram. Henda áheitan varð hoyrd, tí sjálvt um avgjørt varð at steðga við kongligu fiskiroyndunum í februar 1847, so helt klippfiskaframleiðslan fram. Tann tráðurin verður tikin uppaftur í 16. kapitli.

## *13.5 Útflutningur til Spania*

Á hetlandsferðini í 1839 frætti Pløyen amtmaður, at sponsk skip vóru farin at sigla til Hetlands fyri at keypa fisk har. Sum greitt er frá í kapitli 9.3.3 sá hann beinanvegin fyri sær, at hetta eisini fór at gerast ein møguleiki í Føroyum, tá ið fiskur einaferð fór at vera at fáa í Føroyum. Kortini mundi tað koma eitt sindur óvart á hann, tá ið spanska skonnartin „Flor de Muerto" stevndi inn á Havnina ólavsøkudag 1844.

Danski konsulin í Bilbao átti skonnartina, og hon var send við ballast til Noregs, har ætlanin var at keypa eina last av fiski. Skiparin, Francesco de Achutegui, tosaði bara spanskt, og Pløyen dugdi bara eitt lítið sindur av italskum, men hann skilti, at skiparin ætlaði at keypa fisk og lýsi, og hann bjóðaði sær eisini til at føra salt upp til Føroya. Pløyen helt, at hann hevði fingið skiparan at skilt, at handilin í Føroyum var kongligur, og tí var ikki møguligt at handla við privat. Pløyen boðaði kortini Rentukamarinum frá hesum, tí hetta var fyrstu ferð, at eitt spanskt skip kom til Føroya og bjóðaði seg fram at handla her. Ein slíkur handil kundi

212 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 314. Bræv til Rentukamarið dagfest 16. september 1845.

213 TSS. Færø Amt. Kopibok Ø, bræv nr. 87. Bræv til Rentukamarið dagfest 26. oktober 1846.

fáa stóran týdning fyri Føroyar, og undir øllum umstøðum átti Rentukamarið at boða konsulinum í Bilbao frá, hvussu handilin var skipaður í Føroyum[214].

Tá ið Rentukamarið viðgjørdi møguleikan fyri at gera nýggjar fiskiroyndir í 1845, kom spurningurin um marknaðarprísin upp. Rentukamarið óttaðist fyri, at um ein ov stór mongd av klippfiski fór at koma á marknaðin í senn, fór prísurin at fella. Tí var týdningarmikið at tryggja føroyska klippfiskinum góðan avsetning. Tað fór helst ikki at verða nóg mikið at selja allan fiskin í Keypmannahavn, tí har vóru dømi um, at tað gjørdist trupult at sleppa av við vøruna sjálvt við einum væl lægri prísi, tá ið klippfiskur í størri mongdum var til sølu.

Tá var Rentukamarið eisini áhugað í møguleikanum fyri, at fiskurin kundi verið seldur beinleiðis til danska konsulin í Bilbao fyri góðan prís og beint umborð á eitt spanskt skip. Trupulleikin var bara, at eingin hevði heimild til at gera tað, og tí helt Rentukamarið, at amtmaðurin skuldi fáa heimild til at selja fiskin frá royndunum beinleiðis til fremmandar, um hóskandi prísur og trygd fyri gjaldi fekst. Rentukamarið ivaðist ikki í, at tá ið tað fréttist í útlondum um henda møguleikan, so fóru „Lysthavende at indfinde sig."[215]

Tá ið Pløyen fekk boðini um heimildina, fekk hann eisini boð um at seta seg inn í fiskaprísir og annað. Úr amtshúsinum var ikki lætt at fylgja við í nýggjastu fiskaprísum úti í heimi, og tí vildi hann hava Handels- og Industrie Tidende sendandi hetta summarið. Viðvíkjandi gjaldinum fyri fiskin hevði spanski skiparin árið fyri sagt, at hann hevði kaution upp á vekslar í London og Hamburg, men Pløyen kundi ikki meta um, hvussu trygt tað var at selja til eitthvørt handilshús har, og tí vildi hann hava Rentukamarið at geva sær ein lista yvir handilshús í Hamburg, Altona, London, Brüssel, Ostende og møguliga Bilbao og øðrum býum í Spania, sum tað var trygt at taka ímóti vekslum frá[216].

Fyrst í juni 1845 var H.A. Clausen í Havn í tríggjar dagar á veg til Íslands. Hann hugdi at øllum arbeiðinum við fiskiroyndunum, og Pløyen nýtti høvi til at spyrja hann um fiskaprísir og annað viðvíkjandi útflutningi av fiskavøru, men hann dugdi ikki at siga, hvørji handilshús vóru álítandi ella ikki[217]. Meira sæst ikki til, at Pløyen fekst við fiskaútflutning, so helst varð heimild hansara at selja fiskin til fremmandar ongantíð nýtt. Henda søgan um spanska áhugan er kortini áhugaverd, tí spanski marknaðurin fekk seinni stóran týdning fyri føroyska fiskivinnu.

## *13.6 Støðan gjørd upp heystið 1846*

Sjálvt um endaliga avgerðin um at steðga við kongligu fiskiroyndunum ikki varð

---

214 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 92. Bræv til Rentukamarið dagfest 2. august 1844.
215 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 7. januar 1845.
216 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 234. Bræv til Rentukamarið dagfest 3. mai 1845.
217 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 262. Bræv til Rentukamarið dagfest 28. juni 1845.

kunngjørd fyrr enn tíðliga í 1847, so bendir okkurt á, at hugurin at halda fram var lítil, longu áðrenn royndirnar í 1846 vóru lidnar. Í øllum førum fekk Pløyen boð um at greiða frá sínari hugsan um, hvørjar fyrimunir privatar fyritøkur í framtíðini áttu at fáa, um tær valdu at royna fiskivinnu undir Føroyum, og til ber at leggja í tann spurningin, at nú var stundin komin til, at privat áhugamál fóru at taka yvir, har kongligu royndirnar vórðu sleptar. Fútin, sorinskrivarin og handilsforvaltarin skuldu eisini greiða frá sínum hugsanum, og hesar frágreiðingar skuldu fara við síðsta skipi í 1846. Bara fútin kom við einum vælgrundaðum og gjølligum svari, og tí helt amtmaðurin seg eitt sindur til tað svarið, tá ið hann tók samanum. Samanlagt geva hesi bæði álitini eina góða mynd av, hvussu støðan var viðvíkjandi føroyskari fiskivinnu á heysti 1846.

### 13.6.1 Lunddahl fúti vildi hava føroyingar at fiska

Tá ið Lunddahl fúti skuldi svara upp á spurningin um, hvussu fiskivinna á privatum hondum kundi fáast í gongd í Føroyum, býtti hann spurningin í tveir partar, tí munurin á støðuni hjá føroyingum og hjá øðrum donskum undirsáttum var so stórur, og tí var tað ymiskt, hvørjum fyrimunum brúk var fyri.

Felags fyri báðar partar var tó, at brúk var fyri neyvari kunnleika um havið kring Føroyar. Lunddahl kendi bara føroyakortið hjá Born, eitt kort yvir Ísland og Føroyar og eitt kort frá 1829, har Skúgvoy varð nevnd Hestoy. At fáa kort við dýpi á var umráðandi fyri fiskiskipini, so tey kundu finna grunnar aftur, har tey áður høvdu verið heppin, og trygdin gjørdist eisini munandi betri við góðum korti, tá ið mjørki legði seg. Nógvi streymurin gjørdi, at tað var skjótt at reka av leið, og tá var lítið annað at gera enn at føla seg fram eftir havdýpinum. Tí var eitt sjókort við neyvum dýpi á umráðandi fyri teir, sum ætlaðu at royna fiskivinnu undir Føroyum.

Ein týdningarmikil lutur á einum slíkum korti var „den saakaldte færøske Banke“ í útsynning úr Suðuroynni, og sama ár hevði franska stjórnin tikið stig til at geva eitt kort út, har hesin banki var á. Sambært einari notu til kortið var uppmátingin av bankanum gjørd av skiparanum á einum fronskum verjuskipi, og hann hevði bara brúkt eitt ár um uppmátingina. Tað átti at borið til hjá donskum orlogsskipum at gjørt líknandi mátingar, tá ið tey komu henda vegin at vísa danska kongsflaggið. „For Nationalfølelsen vilde det i høj Grad være tiltalende, at Danmark fremfor fremmede Stater var praktisk kendt med Havet ved denne danske Provins.“

Vísindaligar kanningar av havi og fiskastovnunum vóru eisini umráðandi fyri fiskivinnu, og serliga var tað greitt, at náttúruvísindalig vitan um hákellingina vantaði. Í Føroyum var fuglaveiðan eitt gott dømi um, at hegni og hepni ikki vóru nóg mikið til at reka eina vinnu, tí vitanin um náttúruna var avgerandi. Skipini, sum fiskaðu undir Føroyum, vóru ofta inni, og tí átti tað at verið eitt gott høvi hjá serliga yngri náttúrufrøðingum at gjørt eygleiðingar av náttúruni.




*Lunddahl fúti helt, at kunnleikin um føroyskt sjóøki var alt ov lítil, so skuldi ein fiskivinna mennast, var tørvur á neyvari korti enn tí, sum Born hevði gjørt um aldaskiftið. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

### *13.6.1.1 Lítil fyrimunur at fáa danskt vinnulív til Føroya*

Fyri danskar keypmenn var umráðandi, at teir fingu loyvi til at taka alla útgerð við sær og at sleppa at útflyta veiðu og annað, sum teimum lysti. Teimum tørvaði tí pláss til pakkhús og fiskavirking og til at lossa og landa á. Harumframt var tað ein fyrimunur, um teir kundu fáa føroyingar at arbeiða hjá sær fyri løn í peningi, og teir máttu eisini hava møguleikan til at keypa frá Kongliga handlinum, um teimum brádliga vantaði okkurt. Teir, sum fiskaðu hákelling, kundu eisini fingið ein fyrimun, um teir fingu agn og brenni í Føroyum. Annars ynsktu teir sær at sleppa undan øllum avgjøldum og øllum krøvum, sum kundi spilla tíð burtur, og teir vildu helst hava „Frihed til al den spekulerende Virksomhed, som maatte kunne tilstedes dem.“ Um skipini komu úr Keypmannahavn, var tað ein fyrimunur fyri tey, um Kongligi handilin nýtti tóma skipsrúmið á vegnum til Føroya til frakt.

Lunddahl ivaðist kortini í, um føroyingar fóru at fáa nakrar fyrimunir av, at danskir handilsmenn fingu størri møguleikar í Føroyum, og tað bygdi hann partvís á royndirnar frá teimum báðum fiskivinnuroyndunum, sum høvdu verið gjørdar í Føroyum, og sum báðar høvdu miðstøð í Havn. Kongliga royndin fekst serliga við toskaveiðu, meðan Skibsted mestsum bara fekst við hákellingaveiðu. Lunddahl spurdi seg sjálvan, um hesar báðar verkætlanirnar „kunne antages at bidrage til Provinsens Opkomst“, tað vil siga, um tær øktu um gamla vinnu ella løgdu grund undir nýggjar vinnur. Svarið upp á spurningin var treytað av, hvussu nógv samband var millum verkætlanirnar og føroyingar.

Fyri skipini, sum fiskaðu hákelling, kravdist ikki størri manning enn tann, sum skuldi til at sigla skipið, og tí var ikki vanligt, at føroyingar fingu møguleikan at koma umborð á tey skipini. Til lýsikókingina var bara brúk fyri tveimum monnum, og av øðrum fyrifallandi arbeiði var ikki meir enn til tað, sum svaraði til arbeiðið hjá einum manni alt summarið. Í toskaveiðuni var størri tørvur á føroyingum, tí tey skipini skuldu hava væl størri manning umborð til veiðuna, enn skipini brúktu til siglingina, og í fiskavirkingini var nógv arbeiði hjá kvinnum og børnum. Av øðrum arbeiði, sum t.d. í pakkhúsi, var nakað, men ikki nógv. Fiskavirkingin hevði viðført, at Kongligi handilin eisini var farin at taka ímóti fiski til virkingar frá útróðrarbátum, og tann hákellingaveiðan, sum kom afturat toskaveiðuni, skuldi hava kópaspik til agn, sum skuldi keypast í Føroyum. Báðar verkætlanir kundu keypa proviant sum t.d. kjøt, mjólk og egg í Føroyum, men talan var ikki um sølu, sum hevði nakran serligan búskaparligan týdning.

Fiskivinnuroyndirnar góvu handverkarum nakað at gera. Teir høvdu m.a. bygt bæði pakkhúsini, sjálvt um kongliga pakkhúsið var gjørt klárt, áðrenn tað kom til Havnar, og teir høvdu bygt brúnna í Álakeri. Hesi arbeiðini vóru kortini ikki gjørd á hvørjum ári, so tað var mest smiðjuarbeiði í sambandi við umvælingar, sum kundu roknast sum afturvendandi inntøkur. Báðar verkætlanirnar høvdu bøkjara við sær úr Danmark, og Lunddahl roknaði eisini við, at um verkætlanirnar gjørdust størri, so fóru tær at hava sínar egnu handverkarar við úr Danmark, so

teir vóru vísir í, at arbeiðið varð gjørt rætt og skjótt, tá ið tørvur var á tí. Tá fingu føroyingar bara møguleikan sum hjálparar av og á, ella teir kundu fara í læru.

Lunddahl hevði skilt, at umleið 20 menn høvdu verið við skipunum í árinum, og hetta virksemið skuldi økjast nógv, áðrenn pláss var fyri t.d. 100 føroyingum. Sjálvt um tað hendi, so var framvegis talan um avmarkað úrslit, tí teir høvdu verið undirmenn umborð, men brúk hevði eisini verið fyri teimum í bygdunum til útróður, grindarakstur og landbúnað, og tí var henda hýran bara ein tjóðarbúskaparligur fyrimunur í tann mun, teir fingu meira burturúr umborð enn við vanligum arbeiði í landi. Tí var búskaparligi vinningurin ikki líka týdningarmikil sum tann útbúgvingarligi, men skuldi vinningur fáast av sjómansroyndunum, skuldu teir finna varandi arbeiði á sjónum heldur enn at renna ímillum so nógv ymisk arbeiði, sum teir gjørdu. Hesar nógvu ymisku uppgávurnar gjørdu, at teir bara høvdu hálvan dugnaskap til fleiri arbeiði.

Tað var tí fiskavirkingin, sum fór at geva bestu møguleikarnar hjá fólki at vinna eina løn burtur úr fiskiskapi hjá fremmandum handilsmonnum. Henda lønin fór ikki í sær sjálvum at lyfta landið upp, men hon hjálpti, og serliga hjá teimum fátøku í Havn var hetta ein kærkomin møguleiki. Lunddahl visti ikki, hvussu nógv fólk, teirra millum børn, dagliga høvdu arbeitt um summarið, men hann helt ikki, at talið var komið upp á tjúgu. Lunddahl metti, at pláss var ikki fyri nógv meira fiskaarbeiði í Havn, tí hetta summarið hevði øll strondin úr Sandagerði heilt inn til Vestaru vág verið nýtt, og ein partur av strondini á Eystaru vág út til Skansan hevði eisini verið brúkt til fiskaturking. Endaði tað við, at eini 10 líknandi fyritøkur vóru kring landið, fór tað bara at geva 10 av teimum umleið 80 bygdunum arbeiði, og tilsamans fóru 200 fólk at fáa eina hálva arbeiðsløn um summarið.

Lunddahl viðurkendi, at ein slík lønarinntøka hevði týdning fyri tær bygdir, sum fingu hana, men tá talan var um at menna landið, fór fiskivinnan at verða avmarkað til at geva nøkrum eina inntøku, sum var góð at fáa afturat aðrari inntøku. Fyri allar Føroyar fór samlaða inntøkan av fiskivinnuni ikki at gerast størri enn inntøkan av einum einstøkum grindadrápi. Fiskivinna rikin av donskum handilsmonnum fór sostatt ikki at gerast grundarlag undir menning av landinum, og ein vansi við hesum var eisini, at donsku handilsmenninir fóru at taka bestu plássini til pakkhús og virking í t.d. 10 bygdum. Tí var ein slík avgerð tað sama sum at siga, at íbúgvar í Føroyum vóru óynsktir í vinnuni, tí eingi góð pláss fóru at vera eftir til teirra, tá teirra tíð kom.

Skuldu føroyingar bara vera matrósar og arbeiðsmenn hjá handilsmonnunum, so var tað at samanbera við, at handilsmenninir áttu ein akur, sum føroyingar fingu loyvi til at heysta og treskja fyri teir, og tað fór ongantíð at tiltala føroyingar. Samanumtikið vónaði Lunddahl, at hann hevði víst, at virksemi hjá donskum handilsmonnum í fiskivinnuni bara gav sekunderar fyrimunir til føroyingar, samstundis sum tað kundi forða fyri, at føroyingar sjálvir mentu vinnuna. Tað



*Fyri kvinnur og børn var tað ein kærkomin inntøkumøguleiki, at Jacobæus var farin at virka klippfisk í Álakeri. (Mynd: Tjóðsavnið 4342F00000016)*

var bara, um ætlanin var at halda fram við Einahandilinum „for bestandig", at tað var rætt at forða føroyingum sjálvum at reka fiskivinnu í størri mátistokki.

### *13.6.1.2 Fríhandil fortreyt fyri føroyskt riknari fiskivinnu*

Lunddahl hevði eisini fylgt við avreiðingunum í Álakeri, og hann ásannaði, at útróðrarmenn høvdu avreitt meir til klippfiskaframleiðslu, enn hann hevði roknað við. Hetta var ein kærkomin møguleiki, sum spardi tíð, og tí fór hann helst eisini at økja um veiðuna. Tí var hetta eitt tiltak, sum kundi menna ein gamlan vinnuveg. Í árinum, 1846, var avreiðingini ikki so stór, men tað var greitt, at meslingarnir vóru orsøkin til tess. Nólsoyingar høvdu avreitt í hvussu er fjórðingin av fiskinum, og fiskur var eisini komin úr Havn, Kirkjubø, Velbastað, Hesti, Koltri, Hoyvík, Kaldbak, Kollafirði, Toftum, Strondum og heilt av Eiði og úr Sandoynni.

Lunddahl hevði skilt, at 4 pund av ráum fiski góvu eitt pund av turrum fiski. Tá prísurin á turrum fiski var 5½ skillingur fyri pundið, var ein skillingur fyri pundið av ráfiski nakað lágur, men spurningurin var, um klippfiskaframleiðslan mól runt, um prísurin varð hækkaður. Í Havn avreiddu útróðrarmenn ofta, tí tað kom so javnan fyri, at tað ikki eydnaðist at turka fiskin til góða handilsvøru. Eitt var at taka ímóti fiski í Havn, tí fiskavirkarin var her, men um møguleiki

einaferð fór at verða fyri at taka ímóti fiski á handilsstaðnum, sum var tættast við bestu fiskigrunnarnar, t.v.s í Klaksvík, so fór stór framgongd uttan iva at verða í hesi vinnuni. Hesin møguleikin var ikki til staðar, sum nú var.

Lunddahl helt, at tað fyri føroyingar hevði verið stórur fyrimunur, um privatir fingu møguleika at keypa fisk til virkingar við síðuna av Kongliga handlinum, men hann helt eisini, at tað hevði verið forkastiligt, um handilsmenn, sum ikki vóru búsettir í Føroyum, fingu slík loyvi, tí so vóru føroyingar aftur avmarkaðir til at ganga hinum til handa. Eitt var, at føroyingar gingu Einahandlinum til handa, tí Einahandilin avgjørdi so mangt um, hvussu Føroyar fingu vøru, hvussu landið varð skattað, og í heila tikið var allur búskapurin í landinum avgjørdur av Einahandlinum. Vónandi kom tað ongantíð har til, at føroyingar einans høvdu til uppgávu at fiska fyri aðrar, tí so høvdu Føroyar endað „som en tjenende Koloni af den Stat, i hvilken det er indlemmet som en integrerende Del."

Tað var avgerandi, um broytingar skuldu gerast, sum høvdu við sær, at áhugamál hjá Einahandlinum, føroyingum og donskum handilsmonnum møttust ella komu í stríð við hvørt annað, at føroyingar ikki gjørdust undirsáttar. Tí átti grundleggjandi reglan at vera, at vinnur, sum natúrliga hoyrdu mest til føroyingar, sum fiskivinna í hesum førinum, ikki skuldi gevast burtur til íbúgvar í øðrum pørtum av ríkinum. Tað skuldi bara gerast, um tað var púra greitt, at vinnan ikki kundi rekast av føroyingum[218] sjálvum.

Fyri møguligar komandi vinnulívsmenn í Føroyum var Einahandilin ein nógv størri vansi, enn hann var fyri danskar handilsmenn, tí meðan danskir handilsmenn kundi keypa og selja alt í Danmark, vóru føroyingar bundir av at keypa frá og selja til ella í hvussu er gjøgnum Einahandilin. Bara henda staðfesting var sambært Lunddahl orsøk til, at fiskivinna við skipi enn ikki var komin í lag hjá íbúgvum í Føroyum. Henda bundna støðan gjørdi, at føroyingar ongantíð kundu brúka konjunkturarnar á heimsmarknaðinum til egnan fyrimun. Lunddahl vísti á, at tað áður hevði verið nýtt sum grundgeving, at føroyingum vantaði kunnleika og førleika til at reka fiskivinnu, men nú spurdi hann, hvat teir skuldu brúka slíkan lærdóm til, tá ið teir kortini fingu verri treytir enn aðrir vinnulívsmenn.

Lunddahl ivaðist ikki longur í, at eingin, líka mikið hvussu nógva vitan hann hevði fingið sær, fór at byrja í fiskivinnuni, so leingi sum verandi handilsviðurskifti vóru galdandi. Einasti vegurin fram var at geva føroyingum í útlit, at teir í framtíðini kundu gerast skiparar, reiðarar og vinnulívsmenn. Varð tað framtíðarsjónin, so komu kunnleiki og førleiki mestsum av sær sjálvum.

Kapitalspurningurin hevði javnan verið frammi sum ein forðing fyri, at føroyingar fóru undir fiskiskap við deksførum, men Lunddahl trúði eftir hondini lítið uppá, at kapitalur vantaði, tí nú høvdu fleiri „heldige Aar" verið, so fígging

218 Um orðið føroyingar segði Lunnddahl: „Jeg undgaar med Flid at bruge Benævnelsen Færinger, for ikke at misforstaas som om jeg kun talte om dem, der ere fødte paa Færøe, medens jeg mener enhver, som vilde drive Erhverv heroppe under de for Provinsens Indvaanere i Almindelighed gældende Forhold."

til eina byrjandi fiskivinnu vantaði ikki. Roknast kundi við, at fleiri í eini bygd fyrstu tíðina savnaðust í eini roynd at útvega eitt deksfar. Tríggir nólsoyingar vóru longu farnir í gongd, og ein annar møguleiki var, at danir búsettust í Føroyum, so teir kundu luttaka á jøvnum føti við aðrar føroyingar. Teir kundu so taka kapital við sær. Niðurstøðan hjá Lunddahl var greið:

> Efter min ærbødigste Formening er, som foran nævnt og som jeg mangfoldige Gange har haft Lejlighed til at ytre for Deres Højvelbaarenhed, Monopolet i sin fulde Udstrækning den Bom, som altid tilsidst vil findes at staa i Vejen for Fiskeris Drift i det store fra Færø ved Provinsens egne Indvaanere – maaske ogsaa for saadan Drift ved andre Entreprenører. Saa længe som Monopolet bestaar, vil Fiskeriets Drift fra Færøe ved Indvaanerne formentligen indskrænke sig, med enkelte Undtagelser, til det nu brugelige Baadefiskeri med aabne Robaade (som tillige bruges og maa haves til Handelsrejser, Rejser efter Læge og Præst, Skydsninger fra Bygd til Bygd, Grindefangster o.s.v.), medmindre der dispenseres fra Monopolets Indskrænkninger netop i det Øjemed at aabne Adgang til den større Drift.

### *13.6.1.3 Gamli felagsskapurin forðaði fyri kapitalismu*

Tá ið Lunddahl hevði staðfest, at føroysk fiskivinna undir Einahandlinum fór at avmarka seg til útróður, fór hann undir at greiða frá honum. Eygleiðingar hansara av útróðrinum eru áhugaverdar, tí hann sá greitt, at tað, sum seinni hevur verið nevnt bátsbandið í føroyskari søguskriving, var ein forðing fyri menningini av vinnuliga útróðrinum, og hann var eisini greiður í síni fatan av, at bátsbandið var ein partur av, at alt virksemi í bygdunum var skipað í felagsskapi. Sambært Lunddahl var hesin felagsskapur „en Indskrænkning for den driftige enkelte Mand, der kunde have Lyst og Evne til ganske for egen Regning at indrette sit Fiskeris Drift." Felagsskapurin í gamla bóndasamfelagnum var ein meginforðing fyri menningini av einum kapitalistiskum samfelag.

Lunddahl útgreinaði spurningin við at vísa á, at so at siga allir føroyingar tóku lut í útróðrinum. Allar bygdir lógu við sjógv og høvdu atgongd til fiskarí. Øll, sum kundu, royndu at fáa til lívsins uppihald bæði úr sjónum og av landinum, men eingin var bara fiskimaður. „Baadfiskeriets Drift fra Bygderne er, efter gammel Skik og Brug, ordnet som et Bygdeanliggende, saa at det er hele Bygden, som i Fællesskab besætter de Fiskerbaade, til hvis Drift Bygden har Mandskab, nemlig de større Baade til Vinterfiskeriet, de mindre til Sommerfiskeriet." Útróðurin var ein samrunnin partur av øllum øðrum arbeiði í bygdunum, og tað skuldi alt gerast í felagsskapi.

Reglan var, at ein, sum átti í einum báti, ikki sjálvur kundi avgera, hvør slapp við bátinum, tí øll manningin í bygdini skuldi býtast út á stóru bátarnar, helst soleiðis at ein dugnaligur formaður var á hvørjum báti, og fordeilingin millum góðar og minni góðar menn skuldi vera jøvn. Kom óskil í hesa skipanina, var vandi fyri, at onkur bátur als ikki kundi fara út, og menn kundu missa møguleikan



*At øll vinna í gamla bóndasamfelagnum var skipað í felagsskapi, var sambært Lunddahl fúta ein meginforðing fyri menningini av einum kapitalistiskum samfelag. Málningurin hjá Theodor Frederik Kloss er av grindadrápi í Miðvági í 1844.*
*(Mynd: Tjóðsavnið 6790F13)*

at rógva út. Henda skipanin var neyvur partur av „det hele her nu stedfindende System af Forhold i Erhverv og Omsætning; enhver Mand ønsker saavidt muligt at erhverve Naturalprodukter af alle Arter". Trupulleikin var bara, at hesin rakstur, har so nógv sum til bar skuldu hava møguleika at luttaka í útróðrinum, avmarkaði møguleikarnar hjá teimum ídnastu at gagnnýta sína styrki.

Henda skipanin, har bæði bátar og onnur vinna var skipað í felagsskapi, var fastur vani í Føroyum, og møguliga var tað hent og neyðugt undir Einahandlinum i „dette lille isolerede Land", men við tíðini fór felagsskapurin at seta forðingar fyri menningini av fiskivinnu við størri fiskiførum á føroyskum hondum. Vinnan kravdi, at menn vóru burtur í longri tíð, og tað fór at ávirka møguleikarnar at vera við í landbúnaðinum og møguligum grindadrápum. Henda skipan broyttist ikki, fyri tað um einstakir ungir menn fóru umborð á skip um summarið, og nakrar kvinnur og børn fingu arbeiðsløn í fiskavirkingini. Lunddahl hevði skilt, at tað vóru sera fáir, sum vóru við donsku skipunum alt summarið. Ein

møguleiki at vinna á hesum tvørleikanum var, um onkur bygd í felag fór undir at reka eitt deksfar.

At enda mælti Lunddahl eisini til, at føroyskir vinnulívsmenn fingu loyvi til at innflyta húkar, línur, trossar, selgarn, hamp, tjøru, salt, allar timburvørur, sum føroyingar vanliga nýttu, akker og ketur. Hesar vørur vóru ikki á takstlistanum hjá Kongliga einahandlinum. Av takstvørum skuldu teir hava loyvi til at innflyta grýn, ertur, breyð, epli, smør, kjøt og øl til proviant, og teir skuldu eisini hava loyvi til at innflyta útlendsk skip og bátar uttan innflutningsavgjald. At enda skuldu teir sjálvsagt hava loyvi til at útflyta vøruna, sum kom burtur úr fiskinum, og teir skuldu eisini hava møguleikan at taka vørur við til Danmarkar, sum fólk høvdu loyvi til at senda. Hinvegin helt Lunddahl ikki, at virðislønir ella pengastuðul vóru ynskilig, í hvussu er ikki í fyrstu syftu. Lunddahl helt, at hesir fyrimunirnir skuldu gevast øllum íbúgvum í Føroyum beinanvegin. Tað var ikki neyðugt at bíða eftir umsóknum, og loyvið skuldi ikki bara galda í eitt ásett áramál[219].

### 13.6.2 Viðmerkingar Pløyens

Tá ið Pløyen skrivaði sínar hugsanir og sendi álitið hjá Lunddahl víðari, var hann samdur við Lunddahl um, at vitanin um havið og fiskastovnarnar var lítil, tí serfrøðingar høvdu gjørt lítið og einki við at granska í hesum evnunum.

Pløyen helt, at her og nú var úrslitið av fiskiroyndunum ikki annað enn at skaffa føroyingum ta lønina, sum fekst burtur úr virkingini av klippfiskinum, men í fyrstu syftu fór henda inntøka ikki at hava stórvegis ávirkan á samlaðu materiellu vælveruna. Hinvegin var endamálið at geva nøkrum ungum føroyingum møguleikan at royna seg á sjónum og serliga at kveikja áhugan fyri einari rættiligari fiskivinnu, sum var nógv víðfevndari enn útróðurin, og royndirnar høvdu gjørt, at vissa var fingið fyri, at klippfiskavirking bar til í føroyska veðurlagnum.

Í 1846 vóru umleið 400 ríkisdálar goldnir í løn til fiskavirking, og sjálvt um talan ikki var um stóra upphædd, so hevði hon stóran týdning fyri ein „saa næringsløs By som Thorshavn", og tey, sum høvdu fingið løn, fóru at merkja tað, um tey nú fóru at missa møguleikan. Tað vóru serliga kvinnur og børn, sum høvdu arbeitt í fiskinum, og tey høvdu vanliga ongar aðrar møguleikar at fáa eina arbeiðsinntøku. Eisini á henda hátt fór ein økt fiskivinna at fáa stóran týdning fyri Føroyar. Í hesum sambandinum vísti Pløyen á, at hann í Hetlandi hevði sæð, hvussu klippfiskavirking og arbeiðið við sildini gav øllum hondum nóg mikið at gera.

At venja føroyingar, sum vóru vanir við útróður við at vera á havinum í mánaðir, fór sjálvandi at taka tíð, men fleiri høvdu ár um ár søkt um at sleppa umborð og verið har alla fiskitíðina, og tveir av føroyingunum vóru eisini teir bestu fiskimenninir. Ein av teimum hevði hetta summarið drigið 1500 toskar upp, og ein manspartur á útróðri varð roknaður sum góður, um hann kom upp

219 Álit frá Lunddahl fúta dagfest 7. oktober 1846. Her er avskrift hjá Anton Degn í skjalasavni hansara á Tjóðskjalasavninum brúkt.




*Eingin mynd er til av Jacobæusi sum fiskavirkara, men helst hevur virksemið ikki verið ólíkt tí á hesari myndini, sum er í hvussu er hálva øld yngri.*
*(Mynd: Tjóðsavnið 4544F113)*

á 300 toskar. Dømi av hesum slag vístu bæði fyrimunirnar við skipsfiskiskapi, og at føroyingar ikki stóðu aftanfyri aðrar tjóðir, tá ið talan var um at fiska á skipi.

1845 og 1846 vóru so óheppin ár, sum tey kundu blíva, til klippfiskavirking, men kortini var virkaði fiskurin góður. Í so máta var eitt greitt og týdningarmikið úrslit komið burtur úr royndunum. At royndirnar høvdu kveikt áhugan hjá føroyingum, var heldur einki at ivast í, tí nú vóru fleiri umsóknir um stuðul og fyrimunir komnar frá føroyingum, sum ætlaðu at royna seg. Pløyen kom til ta niðurstøðu, at tá ið áhugaðir fingu nøkur rættindi, so var hugurin kveiktur í føroyska fólkinum, og neyðugur kapitalur fór neyvan at vanta í.

Eins og Lunddahl helt Pløyen, at øll rættindi, sum danskir handilsmenn fingu, eisini máttu galda fyri føroyingar, tí „det modsatte vilde involvere en Ubillighed imod Befolkningen af den Provins, til hvis Fremblomstren der netop tages Hensyn". Men Pløyen helt kortini, at Lunddahl var farin ov langt í huganum at verja føroyingar, tá hann segði, at tað var best, um útlendingar vóru hildnir heilt burtur frá føroyskari fiskivinnu. Pløyen helt, at vinnuligu viðurskiftini í Føroyum høvdu avbyrgt føroyingar í so langa tíð, at restin av heiminum var farin langt framum.

Føroyingar vóru evnagóðir, men tað kundi ikki roknast við, at teir skjótt og lætt skuldu vinna innaftur „de Resultater, hvilke de øvrige Nationer i Aarhundreder have vundet ved anstrængt Flid og mange mislykkede Forsøg, som de vilde være i

Stand til at tilegne sig, hvad de se praktiskt og med Nytte sat i Udøvelse.“ Tí helt Pløyen at tað var sera ynskiligt, um menn við vitan og kapitali fingu møguleikan at byrja í Føroyum. „Indbyggerne ville da, om de end i Førstningen maa være Arbejdere, let og snart kunne hæve sig til selvstændige Arbejdsherrer.“

Pløyen hevði áður víst á, hvussu stóran týdning tað hevði, at útróðrarmenn fingu avreitt beinanveg, men hann roknaði við, at tað fyri útróðrarmannin var líkamikið, um hann avreiddi til Kongliga handilin ella til ein privatan. Hansara áhugi var bara at sleppa av við fiskin, og „den Køber, som byder den højeste Pris, maa være ham den kæreste!“

Pløyen var samdur við Lunddahl í, at Einahandilin var størsta forðingin, og tað var eisini tí, at hann í álitinum 26. februar 1839 skrivaði, at tað var ynskiligt at halda fiskivinnuna uttan fyri Einahandilin. Ræturin at innflyta varð nýttur av Skibsted og av kongligu skipunum sjálvandi, og nú høvdu nólsoyingar eisini fingið møguleikan. Viðvíkjandi hesum var niðurstøðan hjá Pløyen: „Med nogle mindre væsentlige Udvidelser formener jeg, at der saaledes er tilstaaet alt, hvad der under Monopolets Bestaaen kan tilstaas, samt at disse Indrømmelser er tilstrækkelige til med Fordel at kunne drive Fiskerierne, naar disse i det hele give noget Udbytte.“ Annars var Pløyen samdur við Lunddahl um hesi rættindini, og at tey skuldu galda í longri tíð. Í resolutión frá 11. mai 1846 varð nevnt, hvørja vøru loyvt var at innflyta til fiskiskap, men Pløyen helt, at nevndu vørurnar meira vóru dømi enn avmarkingar.

Pløyen helt, at rætti mátin at løna fiskimonnum uppá var við „at fiske paa Part“, og hann dugdi ikki at síggja, at nakað forðaði fyri at loyva einum slíkum lønarmáta. Tað einasta, sum skuldi bannast í sambandi við løn, var at løna manningini við vøru, sum varð innførd uttan um Einahandilin.

Samanumtikið kom Pløyen til, at rættindini, sum privatir skuldu fáa í sambandi við fiskivinnu vóru: 1) Loyvi til av skipi at fiska allan fisk og havdýr uttan grind, døgling og kóp. 2) Loyvi til at brúka føroyingar til alt vanligt arbeiði, men ikki at løna teimum við vøru, sum Kongligi handilin seldi. 3) Føroyingar og onnur, sum búðu í Føroyum, skuldu sleppa undan akkersavgjaldi ella gjalda eitt fast árligt gjald til Fátækrakassan. 4) Frælsi til at innflyta allan útbúnað til fiskiskap og fiskavirking. 5) Rættin til at útflyta vøruna til allar havnir. 6) Fremmandir skuldu hava atgongd til at keypa tað, teimum brádliga vantaði, í Einahandlinum, um „Landets Forsyning“ loyvdi tí, og teir skuldu eisini fáa loyvi til at keypa agn til hákellingaveiðu.

Pløyen var samdur við Lunddahl í, at hesi loyvi skuldu gerast permanent, tí tað „vil fremkalde et helt andet Liv hos Befolkningen, end hvis hver enkelt eller de Associationer, som maatte danne sig, skulle ad Adsøgningsvejen søge at opnaa lignende Begunstigelser.“[220]

220 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 100. Bræv til Rentukamarið dagfest 30. oktober 1846.

## 13.7 Samandráttur

Tá ið avgerð varð tikin um at steðga við kongligu fiskiroyndunum, var stórur munur á, hvat ymisku partarnir hildu var komið burtur úr royndunum. Í Rentukamarinum vóru embætismenn vísir í, at royndirnar vóru miseydnaðar. Fremsta grundgeving teirra var, at royndirnar høvdu givið eitt stórt undirskot, og tí høvdu tær verið so at siga nyttuleysar, og eingin orsøk var til at halda fram. Rentukamarið nevndi einki um, at royndirnar høvdu víst, at „Seyen" var ov stórt skip til fiskiskap undir Føroyum, og at tað ikki loysti seg hjá deksførum at laga seg til várróðurin hjá útróðrarbátunum á Norðhavinum. Rentukamarið helt eisini, at lítið var komið burturúr at hava føroyingar umborð, og áhugin fyri at víðka um klippfiskaframleiðsluna var eisini avmarkaður.

Hesum niðurstøðum vóru Pløyen amtmaður og hansara menn púra ósamdir í, tí fyri teir hevði tað stóran týdning, at føroyingar høvdu víst, at teir eftir stuttari tíð megnaðu at gerast bestu fiskimenn umborð. Harumframt var klippfiskavirkingin eitt avgerðandi vegamót, tí hon hevði prógvað, at tað bar væl til at virka fiskin í Føroyum, og møguleikin at avreiða ráfisk hevði eisini víst seg at vera nakað, sum var kærkomið, og sum stór undirtøka var fyri millum føroyskar útróðrarmenn. Tað, sum fyri embætismenn í Keypmannahavn var eitt minus á botnlinjuni, var fyri danskar embætismenn í Føroyum ein sonn kollvelting.

Sjálvt um semja sostatt ikki var um úrslitið av kongligu fiskiroyndunum, so varð úrslitið, at tær hildu uppat. Frameftir skuldu tað vera privatar fyritøkur, sum skuldu gera ítøkiligu royndirnar, og almenna uppgávan gjørdist fyrst og fremst at eggja til hesar royndir við stuðuli og serrættindum av ymiskum slag. Tað verða hesar royndir, sum verða umrøddar í komandi kapitli.

# 14. kapittul
# *Privatar fiskivinnuroyndir í 1840-árunum*

Bæði í lógini fyri føroyska handilin frá 1790 og resolutiónini frá 1821 vóru, sum greitt er frá í 5. kapitli, ásetingar um, at stuðul kundi latast til teir, sum vóru áhugaðir í at fara at fiska við skipi undir Føroyum. Hóast nakað av áhuga var fyri hesum stuðulsmøguleikanum, kom verulig gongd ongantíð á eina fiskivinnu í Føroyum orsakað av hesum stuðli. Eftir at Tillisch amtmaður hevði tikið stig til at byggja eina skonnart til fiskivinnu í 1834, varð ein nýggjur stuðulsmøguleiki skaptur í reglugerðini fyri handilin frá 1836, sum greitt er frá í kapitli 7.4, og sum ávíst í kapitli 11 vóru í 1841 prísbroytingar framdar, sum gjørdu, at prísurin á klippfiski varð hækkaður í Einahandlinum. Ætlanin við kongligu fiskiroyndunum var at vísa, at fiskivinna bar til, og á tann hátt fáa privatar aktørar áhugaðar í vinnuni. Tá ið royndirnar vórðu sleptar, var spurningurin, hvørjar serligar treytir og fyrimunir skuldu gevast fyri at kveikja ein áhuga hjá privatum vinnulívsfólki.

Í hesum kapitlinum verður hugt at teimum royndunum, sum privatir gjørdu at fáa rakstur í fiskivinnu við skipi. Greitt verður frá, hvussu ymisku politisku tiltøkini, sum eru nevnd omanfyri, ávirkaðu íløguhugin, og hvørjar avbjóðingar og forðingar fyri fiskivinnuni komu undan kavi við privatu royndunum.

## *14.1 Stuðulsmøguleikin í 1836*

Tað var Tillisch amtmaður, sum tók stig til at byggja tað fyrsta føroyska deksfarið til fiskiskap eftir 1830, og tað var helst fyrst og fremst fyri at stuðla teirri royndini, at fyriskipanini frá 20. apríl 1836 ásetti, at fiskifør kundu fáa rentufrí lán í 10 ár frá tí almenna. Henda ásetingin fekk suðuroyingar at fáa sær deksbátin „Tveraa“. Handilsforvaltarin Nolsøe fekk í 1838-39 bátin „Ebenezer“ smíðaðan, men av tí, at eingin kelda er funnin, sum sigur nakað um, at hann fekk almennan stuðul til deksbátin, og av tí at báturin ikki av álvara varð nýttur til fiskiskap fyrr enn í 1846, verður søgan um hann goymd til kapitul 14.4.1.

### 14.1.1 „Interessantselskap“ í Suðuroy

Nýggi lánimøguleikin, sum var partur av resolutiónini frá 20. apríl 1836, fekk fyrsta faktorin við úthandilin á Tvøroyri, sum var eitt úrslit av somu resolutión, at taka stig til at stovna eitt partafelag, sum skuldi gagnnýta henda møguleika. Jógvan Djonesen Nolsøe vísti í skrivi 26. februar 1837 á, at tað var kongsins vilji,



*Stutt eftir, at úthandilin var latin upp á Tvøroyri, tók faktorurin har, Jógvan Djonesen Nolsøe, stig til at stovna eitt felag, sum skuldi reka eitt fiskifar. (Mynd: Tjóðsavnið 8779F125)*

at føroyingar skuldu fáa meir burtur úr fiskiríkidøminum, enn teir higartil høvdu fingið, og tað var tí, at lánimøguleikin var partur av lógini. Jógvan roknaði við, at fleiri feløg við 10 til 12 persónum í fóru at nýta henda møguleikan at fáa sær fiskiskip, men hann var eisini vísur í, at tey, sum búðu nær við Trongisvágsfjørð, høvdu ein stóran fyrimun, tá ið talan var um trygga vetrarlegu, tí á fjørðinum

vóru fleiri støð, har til bar at grava innvik í fjøruni, har dokkir kundu leggjast. Tí vildi hann hava menn at tekna seg sum partaeigarar í nýggja felagnum[221].

Longu sama dag skrivaðu áttu suðuroyingar saman við Jógvani undir uppá, at teir vóru partaeigarar í felag, sum skuldi byggja ella lata keypa fiskiskip, og at teir vildu seta millum 40 og 50 ríkisdálar í felagið. Síðani var viðmerkt, at møguliga fór ikki at verða neyðugt við so stórum partapeningi[222].

#### *14.1.1.1 Keypa bát í Noregi*

Hvat síðan hendi, er ógreitt, men 26. apríl 1838 skrivaði J.D. Nolsøe vegna partafelagið til Pløyen amtmann fyri at fáa hann at hjálpa sær við keypinum[223]. Tá ið brævið varð skrivað, vóru ætlanirnar um at byggja skipið í Føroyum sleptar, tí tá høvdu teir frætt, at søllingsku bátarnir í Noregi vóru bæði sterkir og góðir, og tí vildu teir hava amtmannin at hjálpa sær við at keypa ein slíkan bát (Nolsøe 1984: 257).

Pløyen ásannaði, at partafelagið hevði til endmáls at reka fiskivinnu á ein betri hátt, enn higartil hevði verið roynt í Føroyum, men hann helt seg als ikki til sjálvur at loysa uppgávuna. Júst tá var Hunderup sorinskrivari í Keypmannahavn, og tí bað Pløyen hann um at seta seg í samband við kønar menn at fáa vegleiðing, tí hann visti, at Hunderup hevði stóran áhuga í, at føroyingar við egnari hjálp fóru undir slíka fyritøku. Málið var, at Hunderup fann fram til ein deksbát, sum var sterkur og egnaður til havfiskiskap og útgjørdur við øllum reiðskapi. Prísurin fyri alt hetta mátti ikki fara upp um 600 ríkisdálar, men hann ivaðist ikki í, at partaeigararnir eisini fóru at taka av, um prísurin fyri rætta skipið fór eitt sindur upp um tað. Undir øllum umstøðum væntaði Pløyen ikki, at Hunderup av egnum ávum tók av einum keypi uttan fyrst at boða amtmanninum frá, so hann kundi kunna eigararnar, áðrenn endaligur keypssáttmáli varð gjørdur[224].

Hunderup sorinskrivari sæst ikki at hava svarað skrivliga, men 26. september boðaði hann frá, at hann aftur hevði tikið við skyldum sínum sum sorinskrivari, so teir hava uttan iva prátað um úrslitið av kanningunum munnliga. Hunderup hevði samskift við tveir skipssmiðir í Grimstad í Noregi, og teir søgdu, at ein sonevndur søllingskur bátur á 100 til 120 tunnur kundi byggjast fyri 360 norskar spesiudálar[225], ella á leið 720 ríkisdálar.

---

221 TSS. Færø Amt. Indkomne breve litra K, bræv nr. 583. Bræv frá J.D. Nolsøe dagfest á Tvøroyri 26. februar 1837. Hetta brævið er sent amtmanninum 13. februar 1838, men undir journalnummarinum er bara brævið frá 26. februar 1837 at finna.

222 TSS. Færø Amt. Indkomne breve litra K, bræv nr. 583. Bræv frá J.D. Nolsøe dagfest á Tvøroyri 26. februar 1837. Sjálv tekningin er á sama skjali sum fyrra brævið hjá J.D. Nolsøe og dagfest í Froðba sama dag.

223 TSS. Færø Amt. Journal L. Har hevur hetta brævið nummarið 34, men tað er ikki til skjals. Helst er tað sent víðari til annaðhvørt sorinskrivaran ella Rentukamarið.

224 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 40. Bræv til sorinskrivaran Hunderup í Keypmannahavn dagfest 30. mai 1838.

225 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 104. Bræv til Rentukamarið dagfest 6. november 1838.

*„Tveraa" var ein sonevndur søllingskur bátur. Hetta var eitt bátaslag, sum flotayvirmaðurin Peter Norden Sølling um aldaskiftið 1800 menti við fyrimynd úr Onglandi at avloysa opnu norsku loðsbátarnar. Báturin á myndini er tann fyrsti loðsbáturin við dekki, sum Sølling fekk bygdan. „Tveraa" líktist helst hesum bátinum. (Mynd: Wikicommons)*



Á Tvøroyri tóku teir væl ímóti hesum boðunum, og teir vónaðu, at amtmaðurin framhaldandi fór at hjálpa teimum, so skipið kundi byggjast á vári 1839. Teir ynsktu, at forskotið upp á skipið skuldi gjaldast av rentufría láninum, tí so skuldu teir hava sín innskotspening kláran til várs. Pløyen hevði skotið upp, at manning fór yvir til Noregs við timburskipinum eftir nýbygda bátinum, og teir fegnaðust um, at amtmaðurin tók undir við, at teir høvdu eina last av eikitræi heim við aftur, tí teir hildu seg hava tørv á at hava nakað av skipstimburi tøkt. J.D. Nolsøe helt, at neyðugt var við einari lítlari kahytt uppi á dekkinum, og hann vildi fegin hava vindeyga í kahyttini, um tað bar til. Frammanfyri kahyttina var brúk fyri einum lugari við kabús at gera mat á og koyggjum til nakrar av manningini, sum ætlandi fór at verða seks mans. Tað týdningarmiklasta var kortini, at skipið gjørdist ein „god Seiler, thi dermed kan stor Fare i trange Farvande ofte undgaaes."[226]

Níggju dagar seinni skrivaði J.D. Nolsøe aftur til amtmannin, tí nú høvdu partaeigararnir avgjørt at søkja um at fáa rentufría lánið á 500 ríkisdálar, tí teir megnaðu ikki at bera íløguna einsamallir. Afturfyri skuldi skipið pantsetast, og partaeigararnir vóru eisini til reiðar at skriva út pantuobligatiónir, um tørvur var á tí[227]. Dagin fyri sendi J.D. Nolsøe eisini umsókn um loyvi til at flyta eikivið, jarn og tjøru úr Noregi til Føroya, tá ið teir fóru eftir skipinum[228].

226 TSS. Færø Amt. Indkomne breve litra L, bræv nr. 339. Bræv frá J.D. Nolsøe til amtmannin, dagfest á Tvøroyri 7. oktober 1838.

227 TSS. Færø Amt. Indkomne breve litra L, bræv nr. 358. Bræv frá J.D. Nolsøe til amtmannin, dagfest á Tvøroyri 16. oktober 1838.

228 TSS. Færø Amt. Journal L, nr. 359. Sjálvt brævið er ikki at finna í kassanum við Indkomne breve.

Pløyen greiddi 6. november 1838 Rentukamarinum frá ætlanini. Hann greiddi frá, at talan var um solidar menn, men ogn teirra var í jørð, og tað var fyri at sleppa undan at pantseta jørðina og gjalda rentur, at teir søktu um at fáa 500 ríkisdálar í láni. Um lánið varð játtað, ætlaðu teir at fáa bygt eitt skip í Grimstad. Helvtin av pengunum skuldu gjaldast, tá ið sáttmáli um bygging varð undirskrivaður. Fyri at minka um útreiðslurnar helt Pløyen, at teir sambært § 17 í lóg frá 13. august 1790 skuldu fáa loyvi til at taka eikivið, jarn og tjøru við úr Noregi[229].

Rentukamarið svaraði 2. mars 1839, at kongur tann 13. februar 1839 hevði skrivað undir uppá, at partafelagið fekk lánið og loyvi at flyta nakað av tilfari til Føroya[230]. Pløyen fekk svarið frá Rentukamarinum 20. apríl, og 22. apríl 1839 kundi hann boða J.D. Nolsøe og hinum partaeigarunum frá, at Rentukamarið var positivt, og at Pløyen nú vildi hava pappírini í ordan, soleiðis at pant var í skipinum, og at skipið var tryggjað[231].

Dánjal Olsen í Hvalba, Poul Midjord og Joen Jacobsen í Lopra fóru eftir deksbátinum saman við Jóhan Hendrik Weyhe, sum skuldi føra hann. Kjølurin var 24 føtur langur, og báturin var 3½ kommersulest stórur. Teir komu til Føroya við bátinum tíðliga í juli mánaði. Báturin varð nevndur „Tveraa" (Nolsøe 1984: 257).

#### *14.1.1.2 Hægri prísur setur gongd á*

„Tveraa" fiskaði helst ikki í 1839, men í 1840 varð hann góðskrivaður í Einahandlinum fyri at hava avreitt 2 tunnur av søltum fiski á 5 ríkisdálar, og tað árið gjørdi hann eisini 4 frakttúrar fyri handilin (Degn 1929: 35). Í 1841 kom endiliga rættiliga gongd í fiskaríið, og báturin avreiddi 2000 toskar, sum vóru virkaðir til klippfisk, til handilin. Lítið man vera at ivast í, at tað vóru boðini um, at Einahandilin skuldi gjalda meira fyri klippfiskin, sum gjørdi, at gongd kom á fiskingina. Pløyen helt, at hetta var eitt fínt úrslit, tí báturin fór ikki til fiskiskap, fyrr enn besta várfiskitíðin var av, og bæði manningin og partaeigararnir vóru føroyingar, sum hvørki dugdu at stýra skipinum ella vóru vanir við hetta slagið av fiskaríi[232].

Í 1841 skuldi partafelagið byrja at gjalda lánið aftur, og tað gjørdi helst sítt til, at felagið søkti Rentukamarið um stuðul til raksturin av deksbátinum. Rentukamarið bað Pløyen amtmann siga sína hugsan, og í svari sínum vísti Pløyen á, at nógvir trupulleikar vóru hjá eini slíkari fyritøku at vinna á. Tað var ikki fyrr enn í 1841, at tað eydnaðist at fáa rættiliga gongd í fiskaríið. Pløyen hevði longu sjálvur játtað felagnum nakað av stuðuli úr Økonomisk fond, og hann hevði eisini heitt á Landhuusholdningsselskabet um at lata upp til 30 ríkisdálar

229 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 104. Bræv til Rentukamarið dagfest 6. november 1838.

230 TSS. Færø Amt. Journal L, nr. 617. Brævið við loyvinum er ikki til skjals undir Indkomne Breve.

231 TSS. Færø Amt. Kopibók S, bræv nr. 240. Bræv til Factor J.D. Nolsøe og Medinteressanter dagfest 22. apríl 1839.

232 TSS. Færø Amt. Kopibók T, bræv nr. 48. Bræv til Rentukamarið dagfest 13. august 1841.

av pengunum úr det Hansenske Legat til partafelagið. Í brævinum helt Pløyen sjálvur, at hann hevði gjørt alt, sum stóð í hansara valdi at hjálpa felagnum, og tí helt hann, at hann kundi loyva sær at mæla kongi til at stuðla felagnum við 100 ríkisdálum, sum skuldu gjaldast út yvir tvey ár[233].

Amtmaðurin kundi 18. november 1842 boða Evensen sýslumanni í Suðuroy frá, at kongur hevði játtað stuðul til deksbátin „Tveraa". Sýslumaðurin skuldi so boða partaeigarunum frá, og handilsstjórnin hevði fingið boð um at gjalda peningin út[234]. Sama dag bað amtmaðurin handilsforvaltaran gjalda teir 100 ríkisdálarnar út til partaeigararnar[235].

Í 1842 var fiskiskapurin so góður, at handilin kom í neyð av at finna pláss fyri øllum fiskinum. Eisini hjá „Tveraa" var gongd í fiskiskapinum, og teir gjørdu fleiri túrar hetta árið. Í frágreiðing um støðu landsins fyrst í august visti Pløyen at siga, at báturin hevði fingið umleið 4000 toskar, sum vóru virkaðir til klippfisk. Klippfiskur var samstundis eisini virkaður í Havn og í Nólsoy, og eitt úrslit var, at „det bliver efterhaanden indlysende for Almuen, at den Umage, som anvendes paa denne Industrie, kan lønne sig."[236] Sambært Anton Degn varð úrtøkan hjá partafelagnum í 1842 4.676 pund av klippfiski, sum varð seldur í handlinum og privat fyri 242 ríkisdálar og 64 skillingar (Degn 1929: 35). Men júst sum tað sá út til, at rættilig gongd var komin á hesa privatu royndina, steðgaði hon upp aftur, tí einki sæst til, at „Tveraa" landaði nakran fisk eftir 1842.

### *14.1.1.3 Einahandilin framvegis ein forðing*

Tá ið leitað verður eftir møguligum frágreiðingum uppá, hví hetta felagið á Tvøroyri steðgaði upp, koma fleiri frágreiðingar fram. Ein av teimum var, at partafelagið rendi seg í ein trupulleika hjá Einahandilinum, tí tá ið teir lótu virkaða klippfiskin til handilin, vildi handilin tryggja seg ímóti, at fiskurin minkaði í vekt, og tí kravdi hann eitt pund í yvirvekt fyri hvørji 12 pund av klippfiski, sum felagið seldi handlinum. Hetta var ein regla, sum var ásett í §5 í fyriskipan um handilin frá 13. august 1790, men hon var galdandi fyri turran fisk.

Manningin á skipinum vendi sær tí til amtmannin við fyrispurningi um, hvørt tað var rætt at taka hesa somu yvirvektina fyri klippfisk[237]. Amtmaðurin spurdi handilsforvaltaran, um hetta var rætt, og um so var, hvussu hann grundgav fyri hesi mannagongd[238]. Handilsforvaltarin svaraði longu dagin eftir, at hann helt tað

233 TSS. Færø Amt. Kopibók T, bræv nr. 145. Bræv til Rentukamarið dagfest 26. apríl 1842.

234 TSS. Færø Amt. Kopibók U, bræv nr. 1004. Bræv til Evensen sýslumann dagfest 18. november 1842.

235 TSS. Færø Amt. Kopibók U, bræv nr. 1005. Bræv til Nolsøe handilsforvaltara dagfest 18. november 1842.

236 TSS. Færø Amt. Kopibók T, bræv nr. 218. Indberetning om Landets Tilstand til Rentukamarið dagfest 6. august 1842.

237 TSS. Færø Amt. Indkomne breve litra M, bræv nr. 657. Bræv undirskrivað H.P. Johannesen og dagfest í Havn 12. august 1841.

238 TSS. Færø Amt. Kopibók U, bræv nr. 196. Bræv til handilsforvaltaran Nolsøe dagfest 12. august 1841.

vera rætt at halda seg til umrøddu reglu fyri fyrst, men hann hevði eisini hugsað um at spurt Handilsstjórnina. Nolsøe handilsforvaltari skrivaði: „Klipfisk har, som bekiendt, ikke før været Handelsvare, og practiske Erfaringer stode derfor ei til min Raadighed ved dens Indhandling i nogen Henseende.“ Tí avgreiddi hann klippfisk á sama hátt sum annan fisk, men um Handilsstjórnin tók eina aðra avgerð, skuldi partafelagið og onnur, sum høvdu avreitt smærri nøgdir av klippfiski, fáa yvirvektina afturgoldna[239].

Sjálvur helt Pløyen, at yvirvektin á turrum fiski var ivaleysa stór, men hann ásannaði, at turrur fiskur kundi svinna nakað, og tí var helst neyðugt við eini yvirvekt, soleiðis sum handilsviðurskiftini vóru skipað. Hinvegin helt hann ikki, at klippfiskur var vøra, har nakar vandi var fyri, at vektin svann. Heldur var tað hinvegin soleiðis, at vektin øktist, meðan fiskurin lá í pakkhúsi, serliga í teimum fuktigu umstøðunum, sum vóru í pakkhúsunum hjá handlinum. Pløyen ivaðist heldur ikki í, at fyriskipanin frá 1790 bara var ætlað at galda fyri turran fisk, tí tað var einasta fiskavøran, sum handilin tók ímóti. Tá tað harumframt var tikið við, at prísurin á klippfiski sum takstvøra var settur høgt fyri at eggja til íløgur í deksbátar til aðra framleiðslu enn turran fisk, var tað ikki rætt at tyngja „denne begyndende Industrie“ við óneyðugum avgjøldum.

Tí mælti Pløyen í brævi sínum til Rentukamarið til, at forboð varð sett ímóti, at handilin kravdi yvirvekt av klippfiski, og at yvirvektin, sum var kravd inn, varð goldin aftur til teir, sum høvdu avreitt. Pløyen endaði brævið við at siga, at tað var undarligt, at Nolsøe forvaltari ikki bað um ein avgerð frá Handilsstjórnini í hesum málinum, fyrr enn gjørt varð vart við trupulleikan fýra ár eftir, at klippfiskur kom upp í listan av vørum, sum kundu avreiðast til handilin. Av og á vóru smáar nøgdir av klippfiski avreiddar, men ongin hevði klagað, og tí var Pløyen ikki komin upp í málið, fyrr enn henda klagan kom frá manningini á „Tveraa“[240]. Rentukamarið svaraði 13. november 1841, at ein avgerð í málinum var útsett til seinni[241]. Nær tann avgerðin varð tikin, er ógreitt, men hon sær ikki út til at hava havt nakra ávirkan á partafelagið á Tvøroyri.

Felagið á Tvøroyri rendi seg eisini í tann praktiska trupulleikan, at tað var torført at fáa nakran góðan skipara til bátin, og sjálvir vóru eigararnir bøndur og handilsmenn, so teir høvdu ikki tíð til at vera úti við bátinum sjálvir. Tí avgjørdu teir eftir royndirnar í 1842 at draga „Tveraa“ upp á land, og har lá hann, til ein norskur skipari í august 1844 legði restina av síni timburlast á land í býti við deksbátin (Degn 1929: 35).

J.D. Nolsøe var ikki greiður yvir, at hann við at gera henda handilin gjørdi nakað ólógligt. Hann skrivaði til amtmannin og bað um loyvi at býta tey 1300 borðini og 3000 pundini av nævuri millum partaeigararnar, so tað kundi brúkast

239 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 662. Bræv frá handilsforvaltara Nolsøe dagfest í Havn 13. august 1841.

240 TSS. Færø Amt. Kopibók T, bræv nr. 48. Bræv til Rentukamarið dagfest 13. august 1841.

241 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 1155. Bræv frá Rentukamarinum dagfest 13. november 1841.

til at gjalda lánið niður við. Amtmaðurin og sorinskrivarin fóru beinanvegin suður at steðga handlinum og gera avhoyringar í málinum, men onkursvegna kláraði norski skiparin at rýma við bæði sínum egna skipi og „Tveraa“[242]. Vørurnar vórðu so seldar á uppboði fyri 180 ríkisdálar, sum vóru brúktir til at gjalda lánið niður, og restskuldina guldu partaeigararnir sjálvir (Degn 1929: 37).

30. desember 1844 kundi Pløyen boða Handilsstjórnini frá, at partafelagið hevði goldið alt lánið aftur, og at pantiobligatiónirnar tí kundu avlýsast[243]. Áðrenn tað hevði hann mælt til at ganga partaeigarunum á møti í ynskinum um at sleppa undan rættarmáli. Rentukamarið ásetti í staðin nakrar bøtur til partaeigararnar, sum teir høvdu boðið sær til at gjalda, og tá ið tær vóru goldnar, endaði søgan um deksbátin „Tveraa“.

#### *14.1.1.4 Samanumtøka*

Royndirnar við hesum deksbátinum vístu, at tá ið prísurin fór upp um eitt ávíst mark, sá tað út til at bera til at fáa raksturin at bera seg. Tað gjørdist kortini óneyðuga torført, tá ið Einahandlin tók meira enn 8 prosent av avreidda virðinum til sín fyri at tryggja seg ímóti svinni. Hetta kundi Einahandilin gera við at tulka eina 50 ára gamla heimild, sum snúði seg um turran fisk, og at Einahandilin gjørdi tað, gevur eina greiða ábending um, at teir, sum í Føroyum stóðu á odda fyri handlinum, ikki høvdu líka stóran áhuga í at menna eina fiskivinnu, sum myndugleikarnir í Keypmannahavn høvdu. Einahandilin kundi framvegis virka sum ein forðing.

Afturat Einahandlinum var bóndasamfelagið eisini ein forðing. Eigararnir vóru sjálvir bøndur, og hjá teimum var ikki so lætt at fáa umstøður til sjálvir at fáast við fiskiskip. Harumframt vísti tað seg eisini at vera sera torført at finna egnaðan skipara og manning til skipið. Henda niðurstøða vísir, at enn vóru sera fáir at finna, sum høvdu fingið førleikar at fáast við skip, men hon vísir eisini, at tað framvegis var soleiðis, at øll høvdu sítt fasta pláss í gomlu samfelagsskipanini, og ov fá lupu av, sum kundu taka við teimum nýggju møguleikunum, sum vístu seg uttan fyri karmarnar á bóndasamfelagnum.

## *14.2 Príshækkingin í 1841*

At prísurin á einum skippundi av klippfiski 31. mars 1841 hækkaði upp í 16 ríkisdálar og 64 skillingar gjørdi, at gongd kom á fiskiskapin hjá „Tveraa“, men eingin ábending er um, at henda prísbroytingin kveikti áhugan hjá øðrum føroyingum at fáa sær fiskiskip. Hinvegin fylgdu keypmenn við áhugamálum í Íslandi væl við gongdini í Føroyum, og tá ið tað frættist, at tað frá almennari

242 Henda hendingin er nærri lýst í (Degn 1929) og (Nolsøe 1984)

243 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 204. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 30. desember 1844.



*Keypmaðurin Peter Christian Knudtzon hevði nógvar royndir í Íslandi, tá ið hann í mars 1841 søkti um ymisk loyvi í sambandi við, at hann ætlaði at fara undir fiskivinnu í Føroyum. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

síðu var áhugi fyri at fáa gongd á eina fiskivinnu í Føroyum, valdi P.C. Knudtzon at bjóða seg fram.

### 14.2.1 P.C. Knudtzon fær loyvi at fiska

P.C. Knudtzon var stórur vinnulívsmaður í Íslandi, har hann hesa tíðina hevði stórt virksemi í útsynningsfjórðinginum av Íslandi við Reykjavík sum høvuðsstøð. Knudtzon var giftur við einari dóttur Jes Thomsen, og tað var, tá ið hann og tveir svágrar yvirtóku virksemið hjá gamla Thomsen í 1814, at handilsvirksemi hansara í Íslandi byrjaði (Friðriksson og Þór 2013: 87).

Grosserer Knudtzon, sum hann javnan varð umrøddur, var eisini stættatingsumboð og limur í nevndini, sum skrivaði álit í spurninginum um Einahandilin í Føroyum á Stættatingi í Roskilde í 1838. Hann var tí væl inni í bæði føroyskum viðurskiftum og í rakstri av fiskivinnu í Norðuratlantshavi, tá ið hann 10. mars 1841 søkti um loyvi at senda eitt skip á 26 tons at fiska undir Føroyum. Hann søkti eisini um loyvi til at brúka føroyska arbeiðsmegi til at virka fiskin og til at fáa atgongd til høli at goyma salt og fisk í. Harumframt vildi hann hava loyvi til at taka 12 tons av timburi við sær og loyvi til at selja tað privat. Rentukamarið spurdi seg fyri hjá Handilsstjórnini og hjá nevndini, sum júst tá sat og arbeiddi við føroyska handlinum, hvat tey hildu. Handilsstjórnin var varin og helt, at vandi var fyri „forviklinger", um bæði Einahandilin og ein privatur handil vóru virknir á sama stað samstundis. Fekk Knudtzon loyvi, so helt Handilsstjórnin,

at tað var ein sjálvfylgja, at fiskurin varð virkaður í Føroyum, og at føroyingar fingu møguleikan at taka lut í fiskarínum, og at lønin varð útgoldin í kosti ella kontantum og ikki í handilsvørum.

Nevndin, sum arbeiddi við fríari handilsviðurskiftum var ikki óvæntað meira positiv, tí nú høvdu fleiri álit síðstu árini víst á, at tað var óheppið, at føroyingar ikki komu hartil, at teir fiskaðu við deksførum, sum megnaðu at fara út á bankarnar at fiska. Tí helt nevndin, at tað var heppið, at ein maður, sum hevði drúgvar royndir sum reiðari á fiskiførum, sum fiskaðu undir Íslandi, nú hevði fingið áhuga fyri føroysku grunnunum. Um trupulleikar komu í viðvíkjandi Einahandlinum, so helt nevndin, at teir trupulleikarnir áttu at koma í aðru røð, tí tað hevði lítlan týdning í mun til nyttuna av teimum royndunum, sum ein slík fyritøka kundi geva. Nevndin helt eisini, at tað var ynskiligt, at føroyingar tóku sær av fiskavirkingini. Tað gav teimum royndir í rætta arbeiðsmátanum á hesum øki. At enda helt nevndin ikki, at eitt slíkt loyvi til Knudtzen heilsølumann átti at vera nakað serloyvi, men at tað í hesum sambandi átti at verið skipað so fyri, at loyvi „bør gives enhver anden Handlende eller Sagkyndig, som derom maatte melde sig."

Viðvíkjandi hølum at goyma salt og fisk í boðaði Handilsstjórnin frá, at um talan var um pakkhús hjá handlinum, so var einki tøkt høli í løtuni, meðan nevndin helt, at tað ikki átti at verið nøkur forðing, tí tað bar í hvussu er til at finna pláss at byggja skúrar á. Handilsstjórnin og nevndin vóru samd um, at tað ikki var nakað gott hugskot, at Knudtzon slapp at selja timbur, men fyri at hann ikki skuldi sigla við hálvtómum skipi til Føroya, kundi handilin brúka tað lastrúmið, sum Knudtzen ikki sjálvur hevði brúk fyri.

Rentukamarið tók undir við, at tað hevði sera stóran týdning fyri Føroya framtíð, at royndir at fiska við størri deksførum vórðu gjørdar av privatum, og tí tók tað undir við sjónarmiðunum hjá nevndini og mælti kongi til at geva P.C. Knudtzon handilsmanni loyvi at senda eitt 26 tons stórt skip til Føroya at fiska í 1841 og at nýta føroyska arbeiðsmegi til at virka fiskin. Kongligi handilin skuldi brúka lastrúmið, sum var tøkt, til vanligan fraktprís, men um tað var neyðugt fyri at sleppa undan, at Knudtzon heilt slepti síni ætlan, so kundi hann eisini flyta inn timbur fyri egna rokning[244].

Kongur endaði resolutiónina við orðunum: „Derhos bemyndige Vi allernaadigst Vort Rentekammer til at meddele andre Handlende og Sagkyndige, som maatte ønske at drive Fiskerie under Færøerne, Tilladelse dertil."[245]. Soleiðis gjørdist umsóknin hjá Knudtzon til eitt alment loyvi hjá øllum.

Skipið hjá Knudtzon kom ongantíð til Føroya í 1841. Hinvegin fekk Knudtzon klippfisk úr Føroyum, tí tann fiskurin, sum eiðismenn royndu at framleiða

244 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 31. mars 1841.

245 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 563. Bræv frá Rentukamarinum dagfest 1. mai 1841, har boðað verður frá resolutiónini hjá kongi frá 31. mars.

hetta árið, og sum Pløyen sendi víðari til Rentukamarið, endaði hjá honum. Í marsmánaði árið eftir kundi hann boða amtmanninum frá, at fiskurin, sum hann hevði fingið, var sera góður og væl virkaður. Knudtzon helt ikki, at so góður fiskur hevði verið at fingið í handlinum í Íslandi. Í sama brævi svaraði Knudtzon upp á ymiskar spurningar, sum amtmaðurin hevði sent honum í brævi 11. desember árið fyri. Hann greiddi frá, at hann noyddist at geva upp at koma til Føroya við skipi, tí eitt av skipunum úr Íslandi, har fleiri av hansara bestu fiskimonnum vóru umborð, hvarv. Harumframt helt hann, at um vón skuldi vera fyri profitti, skuldi hann eisini hava loyvi til at handla við øðrum vørum sum t.d. salti og timburi, og hann skilti, at tað fór ikki at bera til enn. At selja eitt sindur av salti og timburi til handilin fór ikki at loysa seg. Knudtzon vónaði, at útlitini komandi ár fóru at gerast betri[246].

Sostatt strandaðu ætlanir Knudtzons uppá, at hann vildi hava enn fleiri rættindi enn tey, hann longu hevði fingið, men ein onnur orsøk var helst eisini, at hann í 1842 fór á húsagang (Friðriksson og Þór 2013: 88). Hóast einki fiskarí kom burtur úr hesi ætlanini, so fekk Knudtzon við loyvi sínum sett nøkur hol á einahandilsmúrin. Harumframt kann áhugi hansara fyri føroyskari fiskivinnu hava gjørt sítt til, at handilin hjá Thomsen á Tvøroyri, sum var í hansara svágraætt, gjørdist ein av teimum stóru handilsfyritøkunum í Føroyum, tá ið fríhandilin endiliga kom.

## *14.3 Kongligu royndirnar kveikja áhuga hjá privatum*

Tey rættindini, sum Knudtzon hevði fingið, vóru framvegis galdandi, tá ið Rentukamarið eftirmetti fyrstu kongligu fiskiroyndirnar á heysti 1844 og ásannaði, at endamálið við royndunum ikki bara var at kveikja áhuga hjá føroyingum fyri einari komandi fiskivinnu, tí ætlanin var eisini at vísa donskum handilsmonnum á hesar ótroyttu møguleikarnar.

Longu meðan Rentukamarið var í gongd við at gera sínar eftirmetingar, kom fyrsta umsóknin frá einum privatum keypmanni í Danmark um at sleppa at royna eydnuna í Føroyum. Kongligu royndirnar høvdu eisini sína ávirkan í Føroyum. Í 1846 førdi hesin áhugin til, at tríggjar umsóknir komu um stuðul ella loyvi til at royna seg í privatari fiskivinnu. Ávirkanin hjá Pløyen amtmanni er týðilig í teimum báðum fyrstu umsóknunum, sum komu dag um dag 7. og 8. apríl 1846, tí tær komu ávikavist av Eiði og úr Nólsoy. Tað var júst úr teimum báðum bygdunum, Pløyen fann menn at koma við á kanningarferðina til Hetlands, og tað gjørdi hann, tí hann helt, at har hevði áhugin fyri einari komandi fiskivinnu verið størstur. Í hesum partinum verður greitt frá hesum

246 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra M, bræv nr. 1181. Bræv frá P.C. Knudtzon dagfest í Keypmannahavn 23. mars 1842.

*Tá ið Skibsted kom til Føroya á fyrsta sinni, arbeiddi hann saman við keypmanninum Frederik Sommer. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



fýra royndunum at seta gongd á fiskivinnu í Føroyum. Dentur verður lagdur á at greina tær forðingar, sum verkætlanirnar rendu seg í, og tær ávirkanir, hesar verkætlanir høvdu á føroyska samfelagið.

### 14.3.1 Skibsteds handil gekk á odda

Fyri Pløyen amtmann gjørdist 16. apríl 1845 ein serligur dagur. Henda dagin stevndi jaktin „Magdalena Margrethe" á Havnarvág, og umborð var annar eigarin, russiski varakonsulin og keypmaðurin Andreas Wilhelm Skibsted úr Frederikshavn. Tá teir møttust, gav Skibsted Pløyen amtmanni eitt avrit av brævi frá Rentukamarinum dagfest 7. desember 1844 og eitt veðbræv frá hinum eigaranum av skipinum, grosserer Fr. Sommer, sum trygd fyri rindan av tí, sum skipið fór at fáa brúk fyri í handlinum hetta summarið[247].

Í loyvinum stóð, at treytin fyri tí var, at Skibsted brúkti føroyska arbeiðsmegi, men lønin skuldi ikki gjaldast í vørum. Annars kundi hann fáa loyvi til at seta upp bygningar ella skúrar til virksemið, men hvar og hvussu skuldi avgerast í samráð við amtmannin, eins og amtmaðurin skuldi geva boð um onnur viðurskifti í sambandi við galdandi handilsskipan í Føroyum. Eftirsum hetta var „den første Entreprise af dette Slags for privat Regning," gekk Rentukamarið við til, at

247 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 240. Bræv til Rentukamarið dagfest 9. mai 1845.

fyritøkan kundi keypa proviant og annað frá Kongliga handlinum fyri vanligan prís, men tað legði eina við, at Skibsted skuldi ikki rokna við, at hesin serrættur fór at verða galdandi onnur ár (Nolsøe 1984: 275).

#### *14.3.1.1 Fiskiskapurin hjá Skibsted*

Skibsted sendi beinanvegin skipið út at fiska, og longu 4 ella 5 dagar seinni komu teir aftur við 18 tunnum av livur, sum teir høvdu fingið úr 25 hákellingum. Hetta var eitt frálíkt úrslit, og vónin var, at henda fiskieydnan fór at halda fram. Hjá Skibsted vóru vónirnar góðar, og hann hevði tí biðið um loyvi at byggja eitt hús til lýsibræðing og til at goyma reiðskap í. Pløyen hevði givið honum loyvi til at byggja í fjøruni, sum hoyrdi til garðin hjá amtmanninum í Álakeri. Hetta stað hevði einki virði fyri garðin, og har bar heldur ikki til at virka klippfisk. Pløyen hevði kortini loyvt sær at krevja leigu fyri grundina, tí um hann ikki gjørdi tað, kundi Skibsted vinna sær hevd upp á hana. Um Skibsted skuldi sleppa at selja øðrum bygningin, ella um hann skuldi rívast, um so var, at Skibsted gavst við virksemi sínum, hevði Pløyen lagt upp í hendurnar á uppsitara sínum at avgera. Skibsted var longu farin undir at byggja, tá ið Pløyen skrivaði til Rentukamarið 9. mai 1845[248].

Pakkhúsið og kókihúsið hjá Skibsted fylti ikki nógv í Havn, men hann hevði fingið ávíst tað besta staðið í allari Havnini, sum so lættliga kundi brúkast til slíkt virksemi. Talan var nevniliga um tað einasta staðið, har ongin alda var, og tí kundu skipini næstan altíð leggja at brúnni, sum Skibsted uttan stórvegis trupulleikar og kostnað bygdi[249].

Hepnið hjá Skibsted í fiskiroyndum eftir hákelling helt fram, og 28. juni 1845 høvdu teir ført 72 tunnur av livur til lands[250]. Skibsted legði til merkis, at ein stórur koparketil stóð óbrúktur í arbeiðsskúlanum í Havn. Skúlin fekk henda ketilin í 1835, men hevði ongantíð brúkt hann. Skibsted bjóðaði sær til at keypa ketilin fyri ¾ av innkeypsprísinum ella at leiga hann til 1. november fyri 10 ríkisdálar. Pløyen gav honum loyvi til at leiga ketilin og mælti Rentukamarinum til at selja hann[251].

Meðan tey trý skipini hjá kongi royndu eftir toski, royndi Skibsted konsul í mai, juni og juli eftir hákelling. Henda veiða gekk munandi betur enn toskaveiðan, og Skibsted fekk 180 tunnur av livur. Í august versnaði veiðan, og spurningurin var, um tað bara var veðrið, ella um aðrar orsøkir vóru til vánaligu úrslitini[252]. Fyri árið var úrslitið hjá Skibsted & Sommer 102 føt av lýsi og 18 lispund av klippfiski, og tað vóru teir væl nøgdir við (Nolsøe 1984: 276).

---

248 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 240. Bræv til Rentukamarið dagfest 9. mai 1845.

249 Álit frá Lunddahl fúta dagfest 7. oktober 1846. Her er avskrift hjá Anton Degn í skjalasavni hansara á Tjóðskjalasavninum brúkt.

250 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 262. Bræv til Rentukamarið dagfest 28. juni 1845.

251 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 267. Bræv til Rentukamarið dagfest 2. juli 1845.

252 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 368. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 31. mars 1846.

*Pløyen amtmaður gav A.W. Skibsted loyvi til at byggja pakkhús og kókihús í fjøruni framman fyri amtmansbøin. Skibsted bygdi á Tanganum í Bug, sum seinni eisini varð nevndur Skibstedstangi. Innan fyri tangan var kyrrasta pláss á Havnarvág.*
*(Mynd: Tjóðsavnið 4279F09)*



Árið eftir, í 1846, royndu Sommer og Skibsted seg við fýra skipum kring Føroyar. Kongligu skipini fingu lítið av hákelling tað várið, men ein av skiparunum hjá Skibsted, sum eisini hevði verið í Føroyum árið fyri, var hepnari, og longu áðrenn maimánaður var liðugur, hevði hann landað 50 tunnur av hákellingalivur, men hjá hinum skipunum gekst ikki so væl. Ótti var fyri, at eitt av skipunum hjá Skibsted og Sommer var burturgingið, men tað kom seinni á Havnina, eftir at tað varð rikið allan vegin á Eysturlandið í Íslandi[253]. Samanlagt fingu tey fýra skipini 143 ¾ tunnu av hákellingalivur, sum teir bræddu til 94 tunnur av lýsi, og 440 toskar, sum vóru virkaðir til 5 skippund av klippfiski. Hetta var eitt vánaligt úrslit, tí samanlagt endaði árið við einum undirskoti upp á 4000 ríkisdálar (Nolsøe 1984: 276).

Vánaliga úrslitið gjørdi helst sítt til, at bara jaktin „Magdalene Margrethe" kom til Føroya í 1847. Hon kom 23. mars, og hon hevði tey seteplini við sær, sum amtmaðurin hevði bílagt vegna flestu hús í landinum, nú eplasjúka herjaði sunnanfyri, og sum hann upprunaliga vónaði, at kongligu skipini fóru at taka við sær. Veðrið var vánaligt fyrsta mánaðin, men annars sá út til, at fiskiskapurin kundi gerast góður. Jaktin hevði longu mitt í apríl fingið 12 hákellingar við nógvum lýsi, sjálvt um umstøðurnar ikki vóru góðar at fiska[254]. Teir vóru fram til august hepnir í fiskarínum, og tað sá út til, at hesin túrurin hjá teimum fór at løna seg[255]. Í fyrru helvt av september ætlaðu teir at sigla aftur til Frederikshavn, og tá høvdu teir fingið 163 tunnur av hákellingalivur. Tá ið henda livurin var brædd, var úrslitið 114 tunnur av lýsi[256]. Umframt lýsi hevði skipið stoypt tálgljós

253 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 394. Bræv til Rentukamarið dagfest 28. mai 1846.
254 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 149. Bræv til Rentukamarið dagfest 16. apríl 1847.
255 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 202. Bræv til Rentukamarið dagfest 9. august 1847.
256 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 231. Bræv til Rentukamarið dagfest 15. desember 1847.

og nakað av føroyskari sild, sum Skibsted hevði keypt í Havn, við sær aftur til Danmarkar[257].

„Magdalene Margrethe“ var fastur gestur í Føroyum komandi árini, og teir fiskaðu fyri tað mesta hákelling, men royndu eisini eftir toski. Í 1848 kókaði Skibsted 108 tunnur av hákellingalivur til 72 tunnur av lýsi[258]. Í 1849 høvdu teir 56 tunnur av lýsi heim við sær[259], og í 1851 hevði jaktin 16 lýsiføtur, 37 tunnur og 2 ankør av lýsi við sær til Frederikshavn. Í 1852 fekk „Magdalene Margrethe“ upp í 96 tunnur av hákellingalýsi[260]. Í 1853 gjørdist úrslitið 110 tunnur[261], men árið eftir komu bara 52 tunnur av lýsi á land[262]. Síðsta árið við einahandli, 1855, fekk Skibsted 79 tunnur av hákellingalýsi[263].

Umframt lýsi virkaði Skibsted onkur ár smærri nøgdir av klippfiski, sum tó fyrstu árini sjáldan gjørdust til meir enn hálvtannað skippund um árið. Í 1855 útflutti hann kortini 7 skippund av klippfiski og 15 tunnur av saltaðum fiski. Skibsted gjørdi eisini royndir at útflyta sild. Í 1848 hevði hann ein otting ella ein áttandapart av einari tunnu av sild við til Danmarkar, men í 1852 varð størri dentur lagdur á henda partin, tí tá flutti jaktin 38 tunnur og 40 fjórðingar av sild av landinum.

#### *14.3.1.2 Havnarmenn fingu nýggjan vinnuveg*

Í Havn frættu fólk skjótt, hvussu heppin Skibsted var við sínum fiskiskapi, og seks havnarmenn vendu sær longu í mai 1845 til amtmannin við ynski um at fáa stuðul til at gera ein stóran bát út til hákellingaveiðu. Amtmaðurin helt tað vera ynskiligt at halda stóra áhuganum uppi, og hann fekk tí til vega pening til at leggja dekk í skutirnar á bátinum og til reiðskap, trossar og proviantering. Skjótt varð borið at, og longu fáar dagar seinni, 14. mai, fór báturin sín fyrsta túr. Í tveir dagar fiskaðu teir fýra hákellingar og fingu 3 tunnur av livur úr teimum. Hesir menn tóku undir við teimum, sum søgdu, at hákelling var í havinum kring Føroyar í stórum tali. Tá reiðskapurin var til tað, var lætt at fiska hesar sterku fiskar.

Av teimum seks havnarmonnunum vóru nakrir giftir, og fyri teir var umráðandi at fáa umsett livur til pening bæði til familjuna og til at bøta og økja um reiðskapin.

---

257 TSS. Færø Amt. Kopibók AA, bræv nr. 169. Loyvisváttan frá amtmanninum til Skibsted konsul dagfest 10. september 1847.

258 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 278. Bræv til Rentukamarið dagfest 14. september 1848.

259 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 281. Bræv til Innanríkisráðnum dagfest 8. november 1849.

260 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1644. Bræv frá Skibsted dagfest 7. september 1852.

261 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 240. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 24. september 1853.

262 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra V, bræv nr. 477. Bræv frá Skibsted dagfest 29. august 1854.

263 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra X, bræv nr. 14. Bræv frá Skibsted dagfest 25. august 1855.

*Russiski varakonsulin A.W. Skibsted fór undir fleiri vinnuætlanir í Havn, longu áðrenn Einahandilin varð avtikin. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



Teir vendu sær tí til Skibsted at spyrja, um hann vildi keypa frá teimum. Skibsted bjóðaði sær til at goyma tunnurnar, og so spurdi hann seg fyri hjá amtmanninum, um hann hevði loyvi til at keypa. Amtmaðurin gav loyvi hesa ferð, men vendi sær so til Rentukamarið við fyrispurningi. Skibsted skeyt eisini upp at senda hesar tríggjar tunnurnar til Onglands við einum enskum skipi, sum lá á vágni. Á tann hátt kundi hann kanna marknaðin í Onglandi. Einki bendir á, at Skibsted nakrantíð fekk svar upp á henda fyrispurningin.

Pløyen vónaði, at hákellingaveiðan fór at økjast og fáa „ønskelige Resultater for Indbyggerne," um henda vinna varð stuðlað og slapp undan ymsum forðingum. Hann helt tað vera eina forðing, um menn ikki kundu fara at fiska, tá ið løtan beyðst, og tí mælti hann til, at handilin fór at taka ímóti hákellingalivur. Livurin kundi so annaðhvørt sendast til Danmarkar ella smeltast í Føroyum. Um Rentukamarið tók undir við hesum, hevði verið ynskiligt, um tað svaraði skjótt, tí ein slíkur avreiðingarmøguleiki fór avgjørt at halda lív í áhuganum fyri nýggja fiskivinnutáttinum[264].

Fleiri aðrir føroyskir bátar royndu seg, men tað var bara tann eini báturin, sum fekk tað at bera til[265]. Hesir havnarmenninir, sum royndu seg, kláraðu

264 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 254. Bræv til Rentukamarið dagfest 17. mai 1845.
265 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 262. Bræv til Rentukamarið dagfest 28. juni 1845.

seg í fyrstuni væl, men seinni vóru teir óhepnari, men teir varðveittu kortini reiðskapin[266]. Tí bendir alt á, at ein nýggjur vinnumøguleiki uppstóð, tá ið Skibsted kom, men tað vísti seg skjótt, at hesin vinnuvegurin ikki var líka væl gongdur hjá útróðrarmonnum, sum klippfiskaframleiðslan í hinum endanum á Álakersbønum var tað.

Skibsted sjálvur sá kortini møguleikar í, at útróðrarmenn royndu eftir hákelling. Tí ætlaði hann á heysti 1847 at royna, um hákelling kundi veiðast nærri landi við einum føroyskum báti um veturin og várið. Amtmaðurin helt, at hetta var ein sera áhugaverd roynd, bæði tí hon kundi verið við til at ment hákellingaveiðuna, og serliga tí, at hann skuldi hava føroyska manning umborð. Tað gjørdi, at henda royndin kundi víst á møguleikar fyri, at føroyingar tóku meira lut í hesi veiðuni. Viðvíkjandi veiðini skuldi hann fyrihalda seg upp á sama hátt sum við veiðuni frá skipinum[267]. Amtmaðurin helt heldur ikki, at Einahandlin á nakran hátt varð skalaður av hesi roynd, og tí hevði hann bara givið Skibsted neyðugu loyvini, og hann vónaði, at Rentukamarið tók undir við sær[268].

Í desember var enn einki komið burtur úr hesi ætlan, tí veðrið hevði verið so vánaligt[269], og 22. januar 1848 gav Rentukamarið boð um, at Skibsted ikki fekk loyvi til hetta virksemið, og at tað tí hereftir ikki skuldi koma fyri aftur[270]. Henda leiðin at vísa føroyingum á nýggjar møguleikar at tryggja sær liviumstøður var endaliga stongd.

#### *14.3.1.3 Royndi at seta gongd á ídnaðargerð*

Tað verður javnan sagt, at ídnaðarmenningin kom til Føroya við stórhvalaveiðuni, sum byrjaði í 1890-árunum, sí t.d. (Jacobsen 2007: 7). Henda fatan byggir á, at ídnaðarmenningin er grundað í orkukrevjandi maskinum, sum framleiða onkra vøru, men spurningurin er, um tað gevur so góða meining, tí í Føroyum var tað serliga fiskivinnan, sum flutti samfelagið inn í tann kapitalistiska búskapin, sum ídnaðargerðin skapti í øðrum londum. Tað kjakið skal ikki umrøðast meira her, men um hildið verður fast í kravið um orkukrevjandi maskinur ber til at siga, at tað var Skibsted, sum legði lunnar undir fyrstu ídnaðargerðina í Føroyum. Munurin á framleiðsluni hjá Skibsted og stórhvalaveiðuni 50 ár seinni var nevniliga ikki so stórur, tí meðan hvalaveiðumenn bræddu lýsi burtur úr hvalaspiki, bræddi Skibsted lýsi burtur úr hákellingalivur.

266 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 311. Bræv til Rentukamarið dagfest 14. september 1845.

267 TSS. Færø Amt. Kopibók AA, bræv nr. 168. Bræv frá amtmanninum til Skibsted konsul dagfest 9. september 1847.

268 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 217. Bræv til Rentukamarið dagfest 10. september 1847.

269 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 231. Bræv til Rentukamarið dagfest 15. desember 1847.

270 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 300. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannin dagfest 22. januar 1848. Brævið er ikki at finna í Indkomne breve, men boðini eru greið í sjálvum journalinum.

Skibsted hevði onkran møguleika at bræða lýsi við sær, tá ið hann kom til Føroya í 1845, og sama ár keypti hann eisini ein gamlan koparketil, sum stóð óbrúktur í einum arbeiðsskúla. Árið eftir, tá ið prógv varð fingið fyri, at møguleikar vóru í hesi vinnuni, hevði hann eina lítla dampmaskinu við sær, sum skuldi brúkast til at bræða hákellingalýsi.

Hetta virksemið hjá Skibsted gjørdi helst sítt til, at myndugleikarnir fingu áhuga fyri at gera eitt lýsikókarí í Føroyum til hvalaspik. Tað helt Pløyen vera eitt gott hugskot, tí tað kundi skapa eitt sindur av arbeiði, men í fyrstu syftu helt hann kortini, at tað var rætt at halda fram at senda spikið til Keypmannahavnar, tí har hevði handilin eitt stórt lýsikókarí. Pløyen visti ikki, um spik kundi bræðast í maskinuni hjá Skibsted, men hann ætlaði sær at gera nakrar royndir við tí gjøgnum summarið, sum Handilsstjórnin so skuldi frætta meira um seinni[271]. Dampmaskinan var tó eitt vónbrot, tí hon var ópraktisk, og tí varð eingin roynd gjørd at bræða spik í henni[272].

Hvussu hesi stuttu boðini frá amtmanninum um dampmaskinuna skulu tulkast er eitt sindur ógreitt, tí óvist er, um maskinan var ópraktisk til grindaspik, ella um hon var ópraktisk í heila tikið, soleiðis at Skibsted heldur ikki sjálvur fekk stórt gagn burtur úr henni. Í hvussu er hevði Skibsted onkran máta at bræða lýsi við, og í 1849 søkti hann um loyvi til at innflyta eina maskinu til „Behandling af Grindespæk". Innanríkisráðið hevði einki ímóti, at Skibsted innflutti eina maskinu til at bræða spik, um eingin ólógligur handil varð gjørdur við føroyingar[273]. Tað er ógreitt, hvat kom burtur úr hesi ætlanini, men tá ið treytin var, at eingin ólógligur handil varð gjørdur við føroyingar, merkti tað fyrst og fremst, at Skibsted ikki sjálvur útflutti grindalýsið, tí tað var ein av týdningarmiklastu útflutningsvørunum hjá Einahandlinum, og Einahandilin hevði einkarætt at útflyta hesa vøruna.

Skibsted man kortini hava fingið okkurt burtur úr maskinuni, tí í 1854 søkti hann um at fáa loyvi til at byggja eitt størri lýsikókarí, so hann kundi virka tað lýsið, hann fekk við kópaveiðu undir Grønlandi. Innanríkisráðið kannaði málið hjá Handilsstjórnini og kom til, at tað var ikki neyðugt við slíkum loyvi, og tað skuldi amtmaðurin boða Skibsted frá[274]. Dahlerup amtmaður helt, at um Skibsted skuldi gera eitt stórt lýsikókarí, so skuldi tað liggja í Havn. Og hann kundi saktans fáa meira pláss í Álakersbønum hjá amtmanninum, um brúk var fyri tí. Men um ein slík ætlan skuldi setast í verk, var neyðugt at hava eftirlit við, at reglurnar um Einahandilin ikki vóru brotnar.

---

271 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 368. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 31. mars 1846.

272 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 89. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 26. oktober 1846.

273 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 65. Bræv frá Innanríkisráðnum, dagfest 25. januar 1850. Her í avriti hjá amtmanninum.

274 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra V, bræv nr. 203. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 10. mai 1854.



*Í 1849 søkti Skibsted um at fáa loyvi til at innflyta eina maskinu at bræða lýsi burtur úr spiki. Tað økti um møguleikarnar at fáa eina inntøku burtur úr tí spikinum, sum ikki varð etið. Tað kundi eitt nú vera úr grindakúlum. (Mynd: Tjóðsavnið 8662F0612)*

Tað merkti, at ongar vørur vórðu innfluttar, sum hann ikki hevði loyvi til, og ongar føroyskar vørur útfluttar, sum Einahandilin hevði einkarrætt til at útflyta. Tað var lætt at kanna skipini, áðrenn tey vórðu lossað, men verri var við útflutninginum, og tí var neyðugt við serligari áseting um, at hann ikki hevði loyvi til at keypa spik frá føroyingum, tí annars var ógjørligt at halda eftirlit við, um føroyskt lýsi var blandað upp í grønlendska kópalýsið. Skibsted skuldi áleggjast at boða frá, hvussu nógv kópaspik var innført, og hvussu nógv lýsi kundi væntast at verða framleitt og útflutt av tí[275]. Keldurnar vita ikki meira um hesa ætlanina at siga, so ivasamt er, um hon nakrantíð varð sett í verk. Tað er kortini áhugavert, at henda byrjandi ídnaðarmenningin kom so langt, at tað var líka við, at arbeiði varð skapt í Havn av at framleiða rávøru úr øðrum londum.

### *14.3.1.4 Skibsted gerst føroyingur og letur upp úthandlar*

Skibsted hevði nú bæði skip og alsamt vaksandi framleiðslu á landi í Føroyum, men hann vildi alla tíðina víðka um virksemi sítt. Í sama brævi, sum hann søkti um at fáa loyvi til at innflyta eina maskinu til lýsibræðing, bað hann eisini um at fáa loyvi til at stoypa og selja ljós. Eftir at hava ráðført seg við Handilsstjórnina

275 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 260. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 20. oktober 1853.

boðaði Innanríkisráðið frá, at einki var í vegin fyri, at hann útflutti ljós við handilsins skipum, um hann búsetti seg í Føroyum, men hann kundi ikki fáa loyvi til at flyta tey út við egnum skipum, tí so fór endin at verða, um framleiðslan gjørdist so stór, at handilin noyddist at koyra ljós á takstlistan, og tað hevði gjørt, at føroyingar mistu møguleikan at senda ljós sum privat sendingsgóðs til Danmarkar[276].

Fyri Skibsted var tað í hesum førinum ein fyrimunur, um hann varð skrásettur at búgva í Føroyum, og sjálvt um hesi boðini ikki høvdu nakra ávirkan á avgerðina hjá Skibsted at búseta seg í Føroyum, tí hann hevði longu tikið avgerðina, tá ið hesi boðini komu frá Innanríkisráðnum, so eru tey eitt dømi um, hvørjir fyrimunir vóru í at búseta seg í Føroyum. Skibsted tók helst avgerðina at flyta borgaraskapin á sumri 1849, tí 15. september fekk hann boð frá Innanríkisráðnum um, hvørjar treytirnar vóru fyri at búseta seg í Føroyum. Ein av treyunum var, at hann skuldi siga borgaraskapin sum keypmaður í Frederikshavn frá sær, og 19. juni 1850 skrivaði Andreas Wilhelm Skibsted til amtið við boðum um, at hann nú hevði búsett seg fast í Føroyum. Hann sendi váttan við frá Frederikshavns Kjøbstads Raadstueprotokol, og hann vónaði, at hann á henda hátt leyk treytirnar fyri at kunna búgva í Føroyum sum ein „naturaliseret Færing“[277].

At gerast føroyingur júst tá vísti seg at verða ein klók avgerð, tí fáar dagar, áðrenn Skibsted boðaði frá, at hann búsetti seg í Havn, var ein dómur fallin í hægsta rætti í Keypmannahavn, sum fekk stóran týdning fyri føroyskan handil. 4. juni 1850 varð Pól á Lag nevniliga fríkendur fyri at hava selt víðari brennivín, sum hann hevði keypt í Einahandlinum. Hægsti rættur staðfesti, at tað var loyvt hjá føroyingum at selja vøru, sum teir høvdu fingið hendur á lógliga, víðari til aðrar føroyingar. Hesin hægstirættardómur staðfesti sostatt, at tað ikki hevði verið rætt, tá ið myndugleikarnir høvdu bannað øllum handli í Føroyum (Davidsen 1983).

Hetta var ein kærkomin møguleiki hjá Skibsted, og hann fór longu árið eftir undir at reka handil, har hann seldi ymiskar innfluttar vørur, sum hann fekk kongligu handilsskipini at føra til Føroya. Skibsted var á vári 1851 í Danmark og keypti vøru til handil sín, men tað var týðiligt, at hetta var nakað, sum ikki fall í góða jørð hjá einahandilsmonnum. Meðan hann var í Keypmannahavn hetta várið, hevði hann sítt stríð at fáa vøru senda til Føroya sum sendingsgóðs við skipunum hjá Einahandlinum. Stríðið endaði við, at hann 2. mai klagaði um Handilsstjórnina. Bæði Fogh, handilsforvaltari í Keypmannahavn, og Marten, sum umsat pakkhúsið, greiddu frá málinum, áðrenn Handilsstjórnin svaraði aftur 25. juni, og Innanríkisráðið kom til ta niðurstøðu, „at den af ham indgivne Besværing har været ubeføiet.“[278] Her skal støða ikki takast til klaguna, men alt

---

276 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, nr. 65. Bræv frá Innanríkisráðnum, dagfest 25. januar 1850. Her í avriti hjá amtmanninum.

277 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, nr. 237. Bræv frá A.W. Skibsted dagfest í Havn 19. juni 1850.

278 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, nr. 879. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 4. juli 1851. Hini brøvini liggja sum fylgiskjøl í hesum málinum.



*Í Skopun fekk Skibsted Johan Henrik Poulsen at reka úthandil fyri seg.*
*(Mynd: Tjóðsavnið 5207F130.933)*

málið vísir, at Handilsstjórnin var als ikki glað fyri, at dyrnar vóru latnar upp fyri meira fríum handli, og Einahandilin royndi at brúka teir møguleikar, sum hann hevði fyri at leggja forðingar fyri hesum nýggja handli.

Vørurnar, sum Skibsted seldi, vóru serliga rúsdrekka av ymiskum slag, kaffi og aðrar luxusvørur. Sjálvur ætlaði hann sær ikki at vera fast í Føroyum, og tí fekk hann onnur at standa fyri handlinum, eins og hann læt fólk lata upp úthandlar fyri at økja um umsetningin. Í Havn vóru tríggir slíkir handlar, sum frú Reinert, madam Olsen og Hans Poulsen, ein fyrrverandi jekari á Skansanum, róku. Í Sørvági hevði ein dóttir óðalsmannin Poul Hansen handil fyri Skibsted, í Skopun seldi Johan Henrik Poulsen, og á Eiði læt Samuel Johannesen upp úthandil fyri Skibsted. Hesi fólkini fingu vøru frá Skibsted at selja, og so fingu tey ein lítlan part av vinninginum. Madam Olsen og handlarnir í Sørvági og Skopun seldu mest brennivín og annað rúsdrekka, meðan hinir handlarnir serliga seldu kaffi, sukur, vín, tubbak og manufakturvørur.

At Skibsted skipaði seg á henda hátt við einum høvuðshandli í Havn og seks úthandlum, var eitt mynstur, sum størstu handilsvirkini fylgdu, tá ið tey komu, eftir at Einahandilin varð avtikin í 1856, so eisini á tann hátt var Skibsted ein undangongumaður. Hjá amtmonnunum og teirra samsintu hevði saknur leingi verið í føroyingum, sum vóru áhugaðir í at fáast við handil, so teir áttu at fegnast um, at teir fyrstu føroyingarnir nú fingu høvi at royna seg sum handilsmenn. At enda fekk onkur av hesum úthandlunum, og tær royndirnar, sum fylgdu við, seinni týdning fyri menningina av føroyskari fiskivinnu, sum greitt verður frá í 16. kapitli.

Sjálvt um fleiri fyrimunir vóru við úthandlunum hjá Skibsted, so vóru tað serliga vansirnir við teimum, sum komu at fylla mest í umrøðuni av teimum. Høvuðstrupulleikin var, at hesir handlar lættu um atgongdina til brennivín, og økta brennivínsnýtslan hevði elvt til so nógvan drykkjuskap, at amtmaðurin hevði fingið fleiri neyðarróp bæði úr Vágum og úr Sandoynni. Av tí sama hevði hann vent sær til Løgmálaráðið at spyrja, um tað ikki skjótt bar til at avmarka nýtsluna við lóg. Dahlerup amtmaður helt, at Skibsted hevði ein stóran fyrimun sum handilsmaður, tí hann var púra vísur í at sleppa av við allar vørur, tí hann skuldi bara leggja prísin eitt lítið sindur undir tann takstprísin, sum Einahandilin var bundin til at nýta.[279]

Tá ið Skibsted var komin í gongd við handilsvirksemi sítt, ráddi um at fáa tað at geva meira av sær. Tí søkti Skibsted í 1852 um at fáa gjøldini, sum privat skuldu gjalda fyri at senda vøra til Føroya við handilsskipunum, sett niður. Amtmaðurin helt lítið um tað, tí handilin hjá Skibsted hevði bara økt um nýtsluna av luxusvørum og rúsdrekka. Í umsókn síni legði Skibsted upp til, at handil hansara gav fleiri ungum fólkum í landinum nakað av praktiskum handilskunnleika, sum fór at koma væl við, tá ið fríhandilin kom, men tað helt amtmaðurin vera langt frá veruleikanum, tí talan var í ongum føri um nakran ungan mann, tí tað vóru tríggjar kvinnur og tríggir væl til árs komnir menn, sum róku úthandlarnar[280].

Økta virksemið hjá Skibsted gav honum góðar møguleikar at søkja um bæði stór og smá serrættindi, og í so máta spardi Skibsted seg ikki. Fleiri dømi kundu verið nevnd, men felags fyri tey øll var, at Skibsted á henda hátt ruddaði slóð fyri teimum, sum seinni fóru at handla ella fáast við annað vinnuvirksemi. Tá ið avgerð skuldi takast um umsóknirnar hjá Skibsted, endaði tað javnan við, at handilsforvaltarin í Havn og Handilsstjórnin vóru ímóti fleiri frælsum, meðan amtmaðurin og myndugleikarnir í Keypmannahavn royndu at ganga honum á møti í so stóran mun, sum teir hildu tað bera til. Mynstrið var sostatt, at tað serliga vóru teir, sum varðaðu av Einahandlinum, sum royndu at andøva ímóti broytingum, meðan aðrir myndugleikar royndu at finna ymiskar møguleikar at ganga ynskjunum á møti.

#### *14.3.1.5 Hevði Skibsteds handil týdning fyri gongdina fram móti fríhandli?*

Í bók síni *Fiskeriet og monopolhandelen på Færøerne* skrivaði Anton Degn um virksemið hjá Skibsted, at „nogen Betydning for Landets Opkomst fik denne Virksomhed ikke.“ (Degn 1929: 49). Tað samsvarar illa við søguna, sum her er løgd fram, og verða grundgevingar hansara gjøgnumgingnar, sæst, at hann serliga byggir sína niðurstøðu á brennivínssøluna hjá Skibsted, men lítið og einki verður sagt um øll hini átøkini. Skipsted var størsti kappingarneytin hjá Einahandlinum, hann setti fleiri onnur í gongd við sínum úthandlum, og lítið er at ivast í, at hann

279 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 1 Bræv til Handilsstjórnina dagfest 18. juni 1852.
280 Ibid.



*Fiskur verður virkaður á Rundingi og við pakkhúsið hjá Skibsted. (Mynd: Tjóðsavnið 263)*

hevur verið fyrimynd hjá fleiri av teimum, sum seinni fóru undir handilsligt virksemi. Harumframt var hann ein av teimum størstu handlunum í Føroyum, tá ið fríhandilin endiliga kom, so tað tykist ikki vera nakar ivi um, at alt hetta virksemið hjá Skibsted hevði týdning fyri hesa skiftistíðina.

Skibsted sá eisini fram til, at Einahandilin varð avtikin, og hann tók lut í orðaskiftinum um henda spurning, sum greitt verður frá í komandi kapitli. Tá ið avtøkan av Einahandlinum nærkaðist, heitti Skibsted á íbúgvar um at stovna eitt partafelag, sum skuldi reka handilin í framtíðini. Dahlerup amtmaður sendi Innanríkisráðnum eitt eintak av hesi innbjóðingini, tí tað hevði kanska áhuga har. Sjálvur hevði amtmaðurin hoyrt, at tað ikki gekst so væl at stovna felagið, tí higartil vóru partabrøv bara seld fyri umleið 2000 ríkisdálar[281]. Einki sást heldur aftur til hetta felag, so helst hevur undirtøkan ikki verið nóg góð, men royndin varð so gjørd, og hon vísir, at Skibsted hevði ein týðandi leiklut í skiftinum frá einahandli til fríhandil.

Tá ið Einahandilin var avtikin, fekk Skibsted beinan vegin aðrar vørur at selja. Hann fekk soleiðis við jaktini „Marie Kristine“ 50 toppar av melis, 16 kassar av candis, 2 kassar av roykitubbaki, og í august fór jaktin „Magdalene Margrethe“ til Danmarkar, og hon hevði við sær 100 troyggjur, 35 posar við 688 pundum av fjøður, 62 lispund av ráskornum turrum fiski, 66 skippund av klippfiski, 30 tunnur av lýsi, 20 fjórðingar og 4 ottingar av sild[282]. Hetta boðar

281 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 255. Bræv til Innanríkisráðið 20. oktober 1853.

282 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra X, nr. 886. Bræv frá Randropp fúta dagfest 11. august 1856



*Tá ið ognirnar hjá Einahandlinum vórðu seldar í 1856, átti Skibsted hægsta boð upp á aldagomlu Munkastovuna. (Mynd: Tjóðsavnið 5207F47.920)*

frá, at Skibsted var klárur, tá ið fríhandilin kom, og stutt eftir, 1. apríl 1856, fekk hann handilsloyvi (Nolsøe og Jespersen 2009: 23).

Hetta sama summarið skuldu allar ognir Einahandilsins seljast á uppboði, og Skibsted bjóðaði upp á so at siga allar ognirnar í Havn. Hann fekk tó bert hægsta boð upp á Bakkapakkhúsið og aldagomlu Munkastovuna umframt eitt neyst til eina lossijakt í Rættará (Nolsøe og Jespersen 2009: 15–17). Skibsteds handil var beinanvegin ein av teimum 5-6 stóru handlunum í Føroyum, og virksemið í pakkhúsinum og fiskaplássinum kring tað á Rundingi átti sín stóra part í at menna føroyska samfelagið til eitt fiskivinnusamfelag.

**14.3.2 Eiðismenn keypa „Neptunus"**

Alt bendir á, at Pløyen amtmaður hevði ein fingur við í spælinum, tá ið tríggir eiðismenn 7. apríl 1846 valdu at senda eina umsókn til Rentukamarið um at fáa stuðul til at keypa eitt deksfar til fiskiskap. Hann hevur helst ráðgivið eiðismonnum, tí brævið varð avgreitt á amtsskrivstovuni, sama dag sum tað varð skrivað. Í ummæli sínum segði Pløyen eisini, at hann kendi hesar menninar, at teir høvdu fingið royndir umborð á fiskiførum, og teir høvdu allir bæði hug og evni til havfiskiskap[283].

283 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 377. Erklæring frá Pløyen til umsókn frá eiðismonnum dagfest 7. apríl 1846.

At Pløyen soleiðis royndi at eggja júst eiðismonnum til at taka næsta stigið og fara til havs at fiska, komst ikki burtur úr ongum. Eiðismenn royndu longu í 1819 at salta fisk í tunnur, og ein av oddamonnunum var Pól á Látrinum, sum seinni fór til Hetlands við Pløyen (Nolsøe og Jespersen 2009: 228).

Við Norðhavinum beint norðan fyri seg lá væl fyri hjá eiðismonnum at royna at menna útróðurin. Um somu tíð sum teir royndu seg sum saltfiskaframleiðarar, øktist útróðurin, og tí komu nýggj áttamannafør í bygdina. Tað merkti, at bátsskipanin í bygdini fleiri ferðir skuldi umskipast, og tað var ikki so lætt at finna nakra semju um hana. Tí var sýslumaðurin fleiri ferðir hesi árini norðuri á Eiði og royndi at finna eina loysn á, hvussu bygdarmenninir skuldu býtast út á bátarnar[284].

Í 1838 fingu eiðismenn sær ein seksæring, og tá bóðu teir Pløyen amtmann hjálpa sær við at sleppa undan fraktini á einum 38 alin stórum dúki, sum teir ætlaðu at brúka til henda stóra bátin. Hetta var, segði Pløyen, „et Andragende jeg tillader mig ærbødigst at anbefale", og hann mælti eisini til, at handilsstjórnin legði peningin út fyri sjálvan dúkin, sum hann ikki ivaðist í fór at verða afturgoldin[285].

Við seksæringinum fóru teir aftur í smáum at royna seg við saltfiskaframleiðslu, og í november 1838 seldi Joen Michelsen eina tunnu av saltfiski til Einahandilin, sum hann fekk 6 ríkisdálar fyri, tí handilin metti, at talan var um frískan og góðan fisk. Hetta var fyrsti saltfiskurin, sum handilin keypti í meir enn 10 ár (Degn 1929: 139).

Tá ið Pól á Látrinum kom aftur av hetlandsferðini, lá væl fyri at fara at royna at framleiða klippfisk, men handilin fekk ongan klippfisk í 1840. Sum áður er greitt frá, fór Handilsstjórnin undir ein nýggjan handilspolitikk í kongligari fyriskipan frá 31. mars 1841, sum m.a. hevði við sær, at prísurin á klippfiski hækkaði til 5 skillingar fyri pundið. Nýggi prísurin fekk helst eiðismenn at fara undir at framleiða klippfisk, og 30. juni 1841 sendi Pløyen nakað av klippfiski, sum Pól á Látrinum hevði framleitt, til Rentukamarið til metingar. Hann vónaði ikki, at tað fór at verða tikið illa upp, at hann loyvdi sær at senda Rentukamarinum klippfiskin. Sjálvur helt hann fiskin vera frálíkan, og hann ivaðist ikki í, at hann fór at gerast uppaftur betri, so hvørt sum virksemið vaks[286]. Sum greitt er frá í kapitli 14.2.1, fekk P.C. Knudtzon henda fiskin og helt hann vera sera góðan.

#### *14.3.2.1 Felagsskapurin forðing fyri menning*

Eitt var at fara undir eina nýggja framleiðslu við einum nýggjum og størri báti, men nakað heilt annað var at fáa henda bátin at passa inn í aldagamla bátsfelagsskapin í bygdini. Hesin trupulleikin kom av álvara til sjóndar, tá ið eitt neyst skuldi finnast til nýggja seksæringin. Tað var sjálvsagt, at øll ynsktu sær eitt neyst, sum lá so nær við, har teir landaðu, tí tað var tungt at draga bátin

284 TSS. Eysturoyar Sýsla. Eysturoyar politiprotokol 1816-1835

285 TSS. Færø Amt. Kopibók R, bræv nr. 14. Bræv til Rentukamarið dagfest 7. mai 1838.

286 TSS. Færø Amt. Kopibók T, bræv nr. 30. Bræv til Rentukamarið dagfest 30. juni 1841.



*Eiði var ein undangongubygd, tá ið talan var um at menna møguleikarnar í einari komandi fiskivinnu. (Mynd: Tjóðsavnið 7077F023)*

langa leið, tá man hevði róð 6, 8 ella heilt upp í 10 míl og drigið fisk upp av 80 favna dýpi. Harumframt fór tað illa við bátinum at draga hann langt. Á Eiði høvdu stóru bátarnir fingið bestu støðini til neyst, og smærri summarbátarnir høvdu fingið tey minni góðu.

Felagsskapurin, sum var galdandi, hevði gjørt, at eigararnir av nýggja bátinum høvdu sagt seg hava ognarrætt í hinum neystunum, og teir vildu hava eitt av teimum til nýggja bátin. Tað vóru gomlu eigararnir sjálvandi alt annað enn fegnir um, og tí kom í so stór ósemja um bátaraksturin á Eiði, at teir heittu á amtmannin um at hjálpa sær at loysa hana. Pløyen royndi bæði gjøgnum semingsnevndina og privat at finna eina semju, men alt var til onga nyttu, tí hvørgin parturin vildi geva nakað av sínum rætti. Amtmaðurin vildi ikki greiða myndugleikunum frá øllum teimum óbehagiligheitunum og træganum, sum var komin burtur úr hesi ósemjuni, men hon hevði verið til stóran skaða fyri útróðurin.

Í januar 1842 fór Pløyen til Eiðis at gera eina síðstu roynd at finna semju. Tá sá hann, at einasta staðið, har tað nú bar til at byggja neyst á Eiði, var, har ein høgur bakki stóð. Hann skuldi tí høggast burtur, og tað fór at krevja nokk so nógv arbeiði. Harumframt var talan um privata jørð, so hon skuldi eisini keypast, um eigarin gekk við til tað. Hann væntaði ikki, at eiðismenn fóru at vilja gjalda, so leingi sum teir høvdu vón um at fáa rættindir í verandi neystum, og tí skeyt Pløyen upp at brúka úr Økonomisk Fond at loysa málið. Pløyen hevði avtalað við ognaran, at hann fekk 10 ríkisdálar fyri grundina, og við eigararnar á nýggja

bátinum, at teir fóru at byggja neyst har, eftir at økið var sprongt og grivið út. Samanlagt søkti Pløyen um loyvi at geva eiðismonnum 20 ríkisdálar til nýggja neystið[287].

Henda søgan um bátsskipanina á Eiði er eitt gott dømi um, hvussu ein økt fiskivinna, har útróðurin gjørdist alt meira vinnuligur, setti gomlu bátsbandsskipanina undir trýst, og hinvegin hvussu stór avbjóðingin var hjá teimum, sum høvdu hug at bróta seg leys úr gomlu bygdarkørmunum og royna nýggjar leiðir.

### *14.3.2.2 Senda umsókn um lán til Rentukamarið*

Pløyen royndi við almennum stuðuli at hjálpa eiðismonnum at fáa vinnuligan rakstur í útróðurin, og tí var tað ikki so løgið, at eiðismenn vendu sær til hansara, tá ið teir fingu hug at royna fiskiskap við deksførum. Eiðismenninir, sum tóku stig til at keypa eitt deksfar, vóru Joen Olsen, Hans Petur Olsen og Hans Jacob Joensen. Teir høvdu sambært amtmanninum allir verið við fiskiskipi, og í hvussu er Hans Petur Olsen var við „Seyen“ í 1844. Sannlíkt er, at Pløyen hjálpti teimum at skriva umsóknina um lán á amtsskrivstovuni 7. apríl 1846, tí hann viðmælti umsóknina sama dag, og í viðmælinum segði hann, at hann hevði greitt teimum frá, at teir við at senda eina umsókn fóru at fáa líka nógv burturúr sum við at fara allan tann langa vegin niður at hitta kong[288].

Rentukamarið viðgjørdi umsóknina og vísti til resolutiónina frá 20. apríl 1836, men teir hildu tað ikki vera rætt at játta einari umsókn um lán, tá ið umsøkjararnir ikki sjálvir settu pening í verkætlanina. Tí mælti Rentukamarið frá at ganga hesari umsóknini á møti. Tað kundi ikki mæla til at lata lánið, sum umsóknin nú sá út, tí har varð einki sagt um støddina á deksfarinum, og hvussu stóran part av keypsupphæddini lænast skuldi til. Hinvegin hevði amtmaðurin givið teimum viðmæli sum menn, sum bæði høvdu hug og evni til at fiska við deksfari, og tí mælti Rentukamarið til, at teir fingu høvi at bøta um umsóknina við at greiða frá stødd og øðrum á deksfarinum, teir ætlaðu at keypa, og hvat tað fór at kosta at keypa og reiða tað út. Komu teir við hesum upplýsingum, kundu teir rokna við at fáa upp til 500 ríkisdálar í láni. Kongur gav sítt viðmæli 9. mai 1846[289].

Fyri tveir av umsøkjarunum vóru hetta ikki góð boð, helst tí teir ikki vóru førir fyri at seta stórvegis í ætlanina, og endin varð tí, at teir fóru burturúr. Í teirra stað kom Christian Johannes Joensen, sum saman við Hans Jacob Joensen søkti um eitt lán upp á 2000 ríkisdálar, afturfyri at teir settu jørð á Eiði í veð. Hetta lánið varð teimum játtað 20. september 1847 (Degn 1929: 45), men treytirnar vóru ógvuliga harðar, tí lánið skuldi gjaldast aftur longu árið eftir, í seinasta lagi innan 1. januar 1849 (Nolsøe 1984: 278).

---

287 TSS. Færø Amt. Kopibók T, bræv nr. 128. Bræv til Rentukamarið dagfest 31. januar 1842.

288 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 377. Erklæring frá Pløyen til umsókn frá eiðismonnum dagfest 7. apríl 1846.

289 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 9. mai 1846.


Resolution

den 9de Mai 1846.

*Kongur boðaði 9. mai 1846 frá, at hann fór at stuðla eiðismonnum í skipakeypinum, um teir komu við fleiri upplýsingum um skipið.*

### *14.3.2.3 Keypa jakt í Keypmannahavn*

Teir báðir eiðismenninir vóru staddir í Keypmannahavn, tá ið lánið varð játtað, og har gjørdu teir beinanvegin av at keypa jaktina „Neptunus". Talan var um eitt lítið skip á 9 kommersulestir. Í Keypmannahavn fingu teir eisini samband við ein danskan skipara, Andreas Outzen. 1. oktober varð sáttmáli skrivaður teirra millum, sum er endurgivin í *Føroya Siglingarsøga* 1 (Nolsøe 1984: 278-281).

Teir fóru helst beinanvegin avstað úr Keypmannahavn, tí 14. oktober kom jaktin á Havnina. Úr Havn fóru teir fimm dagar seinni norður í Sundalagið, har teir løgdu „Neptunus" fyri veturin í Hvalvík. Væl varð fortoyað, tí nógvir ringir stormar vóru seinni hetta heystið, men eingir trupulleikar vóru av skipinum[290].

29. februar 1848 vóru reiðararnir saman við skipara og restini av manningini í Havn, har teir skrivaðu manningarlista og gjørdu sáttmála, áðrenn skipið fór til fiskiskap[291]. Teir fiskaðu frá 3. mars til 21. august, men úrslitið var ikki so gott sum vónað, tí teir fingu 2573 fiskar og 749 pottar av hákellingalýsi. Samstundis var fiskaprísurin lágur, so teir fingu stórt tap av hesum fyrsta árinum. Umframt vánaliga fiskiskapin var ein onnur orsøk til vánaliga úrslitið sáttmálin, sum teir høvdu gjørt við skiparan. Hann var so góður fyri skiparan, at reiðaríið ikki megnaði at gjalda honum alla ta hýruna, sum hann eftir sáttmálanum átti. Samanlagt skuldi hann hava 232 ríkisdálar fyri árið, men reiðararnir megnaðu bara at gjalda 93 ríkisdálar. Teir samdust um, at skiparin skuldi fáa 125 ríkisdálar

290 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 225. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 11. desember 1847.

291 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 245. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 13. apríl 1848.

av tí, sum vantaði í, og teir skuldu gjalda 25 av teimum beinanvegin. Við teirri avtaluni fór skiparin aftur til Danmarkar (Nolsøe 1984: 282).

### *14.3.2.4 Søkja um serlig rættindi*

Eftir at kongligu fiskiroyndirnar vóru lidnar í 1846, mæltu bæði fútin og amtmaðurin til, at privat virki ella persónar skuldu fáa ymisk serrættindi, um ætlanin var at royna at seta gongd á fiskivinnu í Føroyum. Hesum møguleikanum greiddi Pløyen amtmaður helst eiðismonnum frá, tí á sumri 1848 søktu teir um „endeel Begunstigelser“, og henda umsóknin samsvaraði væl við hugsanirnar hjá amtmanninum og fútanum. Tað var tí heldur ikki so løgið, at amtmaðurin tók undir við umsóknini, tí fyrimunirnir vóru „nødvendige for Indvaanerne paa Færøe, naar det skal lønne sig for dem til Fiskerie i det større af holde Dæksfartøier.“

Reiðararnir báðir høvdu ikki upprunaliga hugsað um at søkja um hesar fyrimunirnar, men nú mitt í fyrsta fiskiárinum føldu teir forðingarnar, sum verandi handilsskipan legði fyri teimum. Teir høvdu sagt amtmanninum, hvat var komið burturúr higartil, og amtmaðurin helt, at hesi tøl svaraðu rættiliga væl við tað, hann aðrar vegir hevði hoyrt. Í umsóknini søgdu eiðismenn, at teir vildu sleppa at innflyta epli og kol umframt skipsproviant og timbur úr Noregi, og teir vildu eisini sleppa at útflyta bein av hvali og kríatúrum og føroysk ross.

Innflutningur av timburi úr Noreg hevði verið loyvdur síðani skriv frá Rentukamarinum dagfest 8. mars 1845, og síðstu árini vóru epli og kol eisini innflutt, eins og bein og hestar vóru útflutt í skipum, sum fremmandir statsborgarar áttu. Nú áttu nakrir av kongsins egnu „Undersaatter her i Provindsen“ eitt vælegnað skip til hesa vinnu, og amtmaðurin mælti tí til at játta umsóknini, tí hon var bara til gagns fyri reiðararnar og ikki til nakran skaða fyri Einahandilin[292]. Innanríkisráðið svaraði 3. februar 1849, at eiðismenninir kundu útflyta fiskin, sum teir fingu við „Neptunus“, til Hetlands ella onnur støð, og teir kundu eisini útflyta hvala- og djórabein og føroyskar hestar. Til egna nýtslu kundu teir eisini innflyta alt, sum brúk var fyri til fiskaríið, umframt epli og kol og timbur úr Noregi (Nolsøe 1984: 283).

Eiðismenn fiskaðu nakað av toski við „Neptunus“ í 1849, men stutt eftir fóru teir heldur at taka ímóti fiski frá útróðrarbátum og salta hann. Í september fóru teir til Hetlands at selja fiskin. Umborð høvdu teir umleið 3000 saltaðar toskar og longur, 2 skippund av saltfiski, sum Jacobæus hevði vrakað, ¾ tunnu av livur, 2 ¼ tunnu av kjálkum og eini 10 skippund av hvala- og djórabeinum. Í Hetlandi var prísurin fyri fiskin tó so lágur, at teir valdu at sigla víðari til Danmarkar við honum, eftir at teir høvdu selt beinini í Hetlandi (Nolsøe 1984: 283). Fiskurin varð seldur í Nykøbing á Sælandi, tí skiparin, Petur Hans Sivertsen frá Gjógv, var kendur har. Í Nykøbing fingu teir bjóðað góðan prís, men tað var í býti við

292 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 264. Bræv til Rentukamarið dagfest 24. juni 1848. Upprunaliga umsóknin er journaliserað sum nr. 456 í Færø Amts Journal Litra S, men har er umsóknin ikki at finna.

*Petur Hans Sivertsen førdi fleiri ferðir „Neptunus". Tað var m.a. hann, sum gjørdi, at teir í 1849 fóru til Nykøbing á Sælandi at selja fisk. (Mynd: Føroya Siglingarsøga 1)*



korn, og tað høvdu teir ikki loyvi til at innflyta til Føroya. At enda funnu teir ein keypara, sum vildi keypa fiskin og lata teir fáa 150 tunnur av eplum afturfyri, og so skuldi restin av peninginum koma, tá ið fiskurin var seldur (Nolsøe 1984: 284).

Sjálvt um loyvið til at gera handilsferð av hesum slag var komið nakað seint, hildu eiðismenn seg kortini ikki hava havt undirskot av hesum handli. Høvdu teir virkað fiskin til klippfisk, høvdu teir helst fingið meira burturúr, og teir ætlaðu sær til várs at virka fiskin, teir fóru at fáa um veturin, so teir tíðliga á sumri kundu fara til Danmarkar við honum. Dahlerup, sum nú var vorðin amtmaður, var fegin um hesar royndirnar hjá eiðismonnum, og hann ynskti, „at denne Entreprise maa lykkes, da den i saa Fald sikkert vil fremkalde Efterlignelse af andre af Indvaanerne." Tað hevði ikki minsta týdning, tí um handilin gjørdist fríur, var ynskiligt, at føroyingar í hvussu er í ein ávísan mun vóru virknir luttakarar í handilinum[293].

Einki var kortini goldið aftur av láninum enn, og tí kom amtmaðurin upp í tann spurningin. Dahlerup amtmaður helt tað vera „ubegribeligt", at eiðismenn vóru gingnir við til hesar afturgjaldstreytir, tí tað var greitt fyri ein og hvønn vinnulívsmann, at tað fór at vera púra ógjørligt at gjalda hesa upphædd aftur so skjótt. Hann vónaði, at Innanríkismálaráðið sá, at avgjøldini vóru alt ov stór, og at tey hóttu við at gera enda á hesum vinnulívsátaki. Amtmaðurin mælti til, at teir sluppu undan avgjaldi í 1849, og at fyrsti avdráttur varð 200 ríkisdálar 11. desember 1850 og síðani líknandi avdráttir hvønn 11. desember frameftir.

Ein orsøk til, at amtmaðurin soleiðis royndi at hjálpa eiðismonnum, var, at hetta vóru menn, sum „ikke kjende til den Verden, som laae udenfor Færøerne",

293 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 281. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 8. november 1849.



*„Neptunus" fór í 1849 til Nykøbing á Sælandi at selja fiskin. Tá ið teir fingu keypara at lata epli fyri fiskin, eydnaðist at selja. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

og tí høvdu teir gjørt sær eina púra skeiva mynd av, hvussu handilsviðurskifti vóru aðrastaðni. Teir hildu, at bara tað at fara til Danmarkar við einum skipi, sum var útgjørt í Føroyum, var stórt. Nú høvdu teir so lært, at ein slík uppgáva var ikki so torfør, og teir høvdu fingið at vita, hvat danskir handilsmenn ynsktu sær av vørunum, so nú vónaði amtmaðurin, at teir fóru at nýta hesar royndir komandi ár. Tað var bara við slíkum royndum, at føroyingar kundu gera sær vónir um at fáa nakrar fyrimunir av, at Einahandilin varð avtikin.

Amtmaðurin helt, at ein stór forðing fyri virkseminum hjá eiðismonnum var, at teir bara kundu innflyta kol, epli og timbur úr Noreg. Kol slapst ikki so lætt av við í Føroyum, og í Noreg vóru fáir møguleikar at sleppa av við fiskin fyri rímiligan pening. Danmark var mest natúrligi marknaðurin, tí tað var tann vegin, øll onnur sambond gingu, men har kundi tað verða torført at sleppa av við fiskin, um tað ikki bar til at taka korn afturfyri. Mesti handilin í keypsstøðunum var gjørdur við at býta last fyri last. Tí var tað neyðugt at geva monnum loyvi til at innflyta kornvørur. Einahandilin tók neyvan skaða av tí, og um so var, so kundu føroyingar gjalda eitt sindur fyri hvørja tunnu í innflutningsgjaldi. Henda møguleika vildi Dahlerup hava fyri allar føroyingar, tí hetta var ein fínur máti at læra eitt sindur um handil, áðrenn Einahandilin varð avtikin[294].

Í Innanríkisráðnum varð lurtað eftir Dahlerup amtmanni, tí 18. mai 1850 skrivaði Innanríkisráðið, at kongur í samráð við ráðið 16. mai hevði avgjørt, at Hans Jacob Joensen og Christian Johannes Joensen kundu fáa longt afturgjaldstíðina, soleiðis at teir skuldu gjalda aftur 200 ríkisdálar í desember á hvørjum ári, til lánið var afturgoldið. Samstundis fingu teir eisini loyvi til komandi trý árini at innflyta rug, bygg og ertur við skipinum til sølu í Føroyum umframt tað, sum teir longu høvdu loyvi til, uttan at tað var neyðugt at lata avgjald til handilin[295].

294 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 399. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 21. november 1849.

295 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 212. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 18. mai 1850.

*Jens Davidsen, bókavørður, hevði saman við Berg sersjanti keypt bein av kriatúrum kring landið at útflyta. Í 1850 flutti „Neptunus" beinarúgvuna til Hull, har eitt handilshús hevði lovað at tikið ímóti. (Mynd: Frøði nr. 2/2018)*



### *14.3.2.5 Fara út um sínar heimildir*

Eftir at „Neptunus" kom á Havnina 31. oktober 1849, varð hon liggjandi til út á summarið árið eftir, og Páll J. Nolsøe heldur, at orsøkin helst var, at teir ikki longur høvdu ráð til at útgera skipið (Nolsøe 1984: 285). Tá ið boðini frá Innanríkisráðnum komu fram, broyttist støðan helst nakað, og í juni 1850 gjørdi „Neptunus" ein túr til Hull við beinum. Tað var Jens Davidsen, sum saman við Berg sersjanti hevði keypt bein inn í Suðuroy, Norðoyggjum og í Havn. Teir fingu loyvi nøkur ár frammanundan, men beinini komu at liggja í longri tíð, tí eingin hóskandi sølumøguleiki hevði verið. Nú var Berg deyður, og Davidsen hevði vegna seg sjálvan og einkjuna gjørt eina avtalu við skiparan á jaktini „Neptunus" um at sigla eina last av beinum til Hull í Onglandi, har eitt handilshús hevði lovað at taka ímóti lastini[296].

Áðrenn teir fóru henda túrin, høvdu teir vent sær beinleiðis til Innanríkisráðið og søkt um at fáa 600 ríkisdálar í láni afturat. Innanríkisráðið sendi umsóknina til ummælis hjá amtmanninum, men nú var amtmaðurin ikki so positivur, sum hann hevði verið árið fyri. 7. september 1850 mælti hann frá at geva teimum fleiri lán. Hann greiddi frá, hvussu gott endamálið upprunaliga hevði verið, men henda fyritøkan hevði á ongan hátt verið rikin soleiðis, sum hon kundi og átti at verið rikin.

Ætlanin við stuðulinum var, at „Neptunus" skuldi vísa á gongdar leiðir í føroyskari fiskivinnu, men skipið hevði fiskað sera lítið. Í 1849 fiskaði tað í stutta

296 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T. Hetta brævið liggur millum ójournaliserað brøv í eini mappu fyri seg. Bræv frá J. Davidsen dagfest 10. juni 1850.



*Poul Andreasen, Eiðis-Pól, var kokkur á longu ferðini summarið 1850. (Mynd: Tjóðsavnið 8779F127)*

tíð, og seint á sumri fóru teir til Danmarkar við saltaðum fiski, men amtmaðurin hevði skilt, at teir sluppu ikki av við fiskin, tí hann var so illa hagreiddur. Ein keypmaður í Nykøbing tók fiskin og skuldi royna at selja hann. Í 1850 fóru teir als ikki at fiska, og ikki fyrr enn summarið var væl liðið, fóru teir í gongd, og tá fóru teir at sigla við farmi. Sambært amtmanninum kundi ein og hvør síggja, at tað ikki bar til at reka slíka vinnu við einum so lítlum skipi, og úrslitið varð eisini, at teir bara settu pening til, og tí megnaðu teir ikki at gjalda nakað lán aftur.

Um persónarnar segði amtmaðurin, at teir „have i det hele viist, at de aldeles ikke have Lyst eller Forstand til at drive det Foretagende, som de have paabegyndt, paa den Maade, som det var Regjeringens Hensigt.“ Tí noyddist hann, sjálvt um upprunaliga endamálið var so gott, at mæla til, at hesir persónarnir ikki fingu fleiri lán[297].

Seinni kom fram, at alt ikki ruggaði rætt við hesi farmasiglingini, sum teir nú vóru farnir undir. Sjálvir vildu eiðismenninir vera við, at teir eftir túrin við beinum í Hull lógu í Keypmannahavn eina tíð, men við tíðini kom undan kavi, at skiparin Petur Hans Sivertsen hesar mánaðirnar í 1850 skuldi havt siglt til Hull, Altona og aðrar havnir við føroyskum handilstroyggjum. Tað var greitt brot á einahandilsreglurnar, so nøkur ár seinni stóðst drúgt rættarmál burtur úr hesum, sum meiri ikki skal gerast við í hesi ritgerðini.

---

297 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 529. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 7. september 1850.

### *14.3.2.6 Innflyta ull og útflyta troyggjur*

Hóast tað var ivasamt, hvussu nógv kom burtur úr verkætlanini við „Neptunus“, tá ið talan var um fiskivinnu, so elvdi møguleikin at flyta farm til og úr Føroyum til eina aðra ikki sørt áhugaverda ætlan, sum má metast sum okkurt slag av avleiddum virksemi. Hetta var ein ætlan um at innflyta íslendska ull, sum so kundi virkast til troyggjur í Føroyum.

Hvaðani hugskotið stavaði, er ógreitt, men tá ið teir komu til Keypmannahavnar eftir túrin í Hull í 1850, søktu teir um loyvi til at innflyta íslendska ull til Føroya avgjaldsfrítt og síðani framleiða vørur burtur úr henni. Tað loyvið fingu teir 24. oktober, og í fyrstu syftu var loyvið galdandi í tvey ár. Amtmaðurin skuldi ansa eftir, at eingin vøra, framleidd av føroyskari ull, varð útflutt, sum um hon var íslendsk, og hann skuldi eisini hava neyvt eftirlit við, at eiðismenninir bara útfluttu vørur framleiddar av ullini, sum teir sjálvir høvdu innflutt[298].

Eftir at loyvið var komið upp á pláss, fóru teir við 180 tunnum av byggi og 14-15 skippundum av íslendskari ull til Føroya, og „Neptunus“ kom á Vestaru vág 3. desember. Dagin eftir fór fútin umborð á skipið at kanna, um teir innfluttu annað enn tað, sum teir høvdu loyvi til. Skiparin, P.H. Sivertsen, vísti fútanum tollseðilin, hann hevði fingið í Keypmannahavn, sum vísti, at umborð vóru 200 tunnur av byggi og 14 skippund 19 lispund og 1 pund av íslendskari ull. Tær tríggjar lastalúkurnar vóru tiknar av, so fútin kundi gera sítt tolleftirlit, og bæði kahútt og lugar við øllum skápunum, sum har vóru, vórðu kannað. Teir sóu ull í øllum lastalúkunum og ymsa aðra staðni umborð, og í aftastu lúkuni sást korn undir ullini. Restin var ymiskt privat, so einki var hjá fútanum at finnast at[299].

Ullin varð løgd inn í skúlan í Saltnesi, og teir fingu fólk í Eysturoynni at virka ullina til troyggjur, afturfyri at tey fingu triðingin av troyggjuvirðinum goldnan í korni (Nolsøe 1984: 288). Amtmaðurin greiddi Innanríkisráðnum frá, at íslendska ullin, sum eiðismenn høvdu innflutt, var framleidd til 2979 troyggjur, sum vigaðu 3352½ pund ella 10 skippund 9 lispund og 8½ pund. Hesar troyggjur fóru umborð á „Neptunus“, sum fór til Keypmannahavnar 27. apríl 1851.

Ullin kom væl við hjá nógvum fátøkum í landinum, tí hon gav teimum ein møguleika at vinna nakað av peningi ta árstíðina, tá ið tað annars var torført at finna lønandi arbeiði. Tey, sum virkaðu ullina til troyggjur, fingu 23 skillingar fyri hvørja troyggju, og tá høvdu tey bæði vaskað, karðað og spunnið ullina, áðrenn troyggjan varð bundin. Føroyingar vóru væl nøgdir við henda nýggja inntøkumøguleikan, og tí helt amtmaðurin, at tað hevði verið ynskiligt, um meira av tí nógvu íslendsku ullini, sum varð útflutt úr Íslandi, endaði í Føroyum. Ein trupulleiki við troyggjunum var kortini, at tær vóru so leysar og léttar, at tær flestu

298 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 469. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 24. oktober 1850.

299 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 477. Frágreiðing hjá fútanum dagfest 4. desember 1850.



*Íslendska ullin, sum eiðismenn keyptu í Keypmannahavn, varð løgd inn í skúlan í Saltnesi, og eysturoyingar virkaðu hana til troyggjur. (Mynd: Tofta søga bind 1)*

vigaðu millum ¾ og 1 pund, har tær áttu at vigað 1½ pund. Amtmaðurin vónaði ikki, at hetta góða átakið fór at steðga, tí vørurnar vóru ov illa framleiddar[300].

Hjá Handilsstjórnini kom tað eitt sindur óvart á, at eiðismenn fingu framleitt eina so stóra nøgd av troyggjum, tí tá ið hon 23. oktober 1850 var gingin við til at geva eiðismonnunum loyvi, var tað tí, at hon ikki roknaði við, at so nógv fór at verða framleitt av íslendskari ull. Orsøkin var, at Handilsstjórnin undirmetti føroysku arbeiðsmegina og helt, at hon var avmarkað til tað, sum kravdist til at framleiða burtur úr føroysku ullini. Fyri Handilsstjórnina var einasti vandin við hesi framleiðsluni, um hon gjørdist so stór, at hon fór at ávirka marknaðarprísin á bundum troyggjum. Nú amtmaðurin hevði boðað frá, at nærum 3000 troyggjur vóru framleiddar, ásannaði Handilsstjórnin, at tað „ikke er et saa ganske ringe Parti."

Handilsstjórnin royndi at grundgeva við, at ein orsøk til, at meira var framleitt, enn hon hevði roknað við, var, at fáar grindir høvdu verið, og tvey tey síðstu árini hevði fiskiskapurin heldur ikki verið so góður. Men Handilsstjórnin helt eisini, at talan hevði verið um ójavna kapping, tí tá fólk fingu 23 skillingar ella ein triðing av takstprísinum fyri at virka eina troyggju, sum bara vigaði millum ¾ og 1 pund, so var tað „begribeligt, at Arbeiderne have foretrukket at tilvirke Trøier af islandsk Uld, naar disse kunde leveres saa slette og løse forarbeidede, at Vægten ikke blev meget over den halve af de almindelige færøske Trøiers Vægt, og altsaa kunde tilvirkes i langt kortere Tid."

300 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 114. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 28. mai 1851.

Hesum sá Handilsstjórnin ein stóran vanda í, og tí kundi hon koma til ta niðurstøðu, at tað rætta var at steðga hesum royndum nú, so føroyingar ikki vandust til „at vise en farlig Skjødesløshed med Tilvirkningen af Uldgods". Hendi tað, fór tað at ávirka tað „hidtil vedligeholdte gode Renommee", sum hevði tryggjað føroyskum vørum atgongd til evropeiskar marknaðir og gjørt, at føroyskar ullvørur eisini vórðu seldar í Amerika. Hesar vánaligu troyggjurnar vóru tí sera skaðiligar fyri umdømið, og tað kundi skjótt ávirka sølumøguleikar og prísin. Tað undraði tí eisini Handilsstjórnina, at amtmaðurin vildi hava fleiri keypmenn at senda íslendska ull til Føroya, samstundis sum hann vónaði, at henda vánaliga vøran ikki fór at hava skaðiliga ávirkan á aðrar prísir. Handilsstjórnin vónaði, at ætlanin varð steðgað, tí tað var „en af Bestyrelsens væsentligste Pligter at vaage over, at de færøiske Frembringelser, der alle ere ansette som fortrinlige i sit Slags, vedligeholde deres gode Renommee."[301]

Innanríkisráðið bað amtmannin siga sína hugsan um hesi viðurskifti[302], og hann var ikki samdur við Handilsstjórnina. 6. august 1851 svaraði amtmaðurin, at vraking av vørum kundi forða fyri teimum óhepnu avleiðingunum, sum Handilsstjórnin hevði víst á, men annars tók hann als ikki undir við greiningini hjá Handilsstjórnini av føroysku arbeiðsmegini. Amtmaðurin segði, at føroyskur útflutningur serliga var fiskur, lýsi og ullvørur. Lýsiframleiðslan var serliga um summarið, tí bæði grind og seiður var serliga at fáa um summarið, og tað var eisini tá, til bar at avreiða ráfisk. Tí var ein stórur trupulleiki á føroyska arbeiðsmarknaðinum, at so lítið lønandi arbeiði var at fáa um veturin. Ullin í Føroyum var langt frá nóg mikið til allar hendur, og tað hevði síðsta árið, sum var besta seyðaárið, fólk mintust, greitt víst.

Sjálvt tá ið nógvur fiskur var at fáa, var einki at gera hjá konufólki og teimum monnum, sum ikki fóru at fiska, annað enn at virka ullvørur. Tí var eisini sera stórur eftirspurningur eftir at fáa ullina hjá embætisgørðunum, sjálvt frá bóndum, sum ikki høvdu nóg mikið av arbeiði til arbeiðsfólk síni. Íslendska ullin kom tí beint inn í eitt tómrúm, har føroyska arbeiðsmegin sat við ongum at gera. Tað passaði ikki, at eingin tøk arbeiðmegi var í Føroyum, sum Handilsstjórnin hevði sagt, og amtmaðurin var stutt sagt misnøgdur við limirnar í Handilsstjórnini, at teir við hesum úttalilsi vístu, at teir vistu alt ov lítið um tað landið og fólkið, sum teirra avgerðir høvdu so stóra ávirkan á. Tí høvdu embætismenn umrøtt spurningin, áðrenn eiðismenn tóku stig til at innflyta ull til víðari framleiðslu. Ullin kom frá Wulff & Ørum, og annaðhvørt teir ella eiðismenninir høvdu skipað tað so, at tað loysti seg best at framleiða vánaliga vøru. Hugskotið var kortini rætt, og við væl virkandi vrakingarskipan var eingin vandi fyri umdøminum hjá føroysku troyggjunum á marknaðinum[303].

301 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, nr. 880. Bræv frá Handilsstjórnini til Innanríkisráðið dagfest 28. juni 1851. Her í avriti sent amtmanninum.

302 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 880. Bræv frá Innanríkisráðnum, dagfest 5. juli 1851.

303 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 163. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 6. august 1851.

Um tað hevði nakað við henda tvídráttin millum amtmannin og Handilsstjórnina at gera ella ikki, er ógreitt, men eiðismenn innfluttu ongantíð íslendska ull til virkingar aftur. Meginorsøkin var uttan iva, at eingir pengar vóru eftir í felagnum. Í januar 1852 skrivaði Innanríkisráðið, at enn var onki afturgoldið, sjálvt um eiðismenn høvdu fingið fleiri útsetingar. Tí fekk amtmaðurin boð um at gera tað, sum neyðugt var, fyri at fáa hesa skuldina upp á pláss[304]. Seinni sama ár gjørdi „Neptunus" enn eina ferð við beinum til Hull, men hon hevði ongan farm heim við aftur, og hetta gjørdist eisini seinasti túrurin hjá jaktini.

Reiðararnir høvdu ongantíð megnað at goldið nakað aftur av láninum, og í maimánað 1852 avgjørdi Innanríkisráðið, at jaktin skuldi seljast. Roynt var at selja hana á uppboði 1. oktober, men eingin bjóðaði. Tí varð hon í mai árið eftir førd til Keypmannahavnar, har hon varð seld á Børsen fyri 665 ríkisdálar. Tá ið útreiðslurnar av at umvæla hana og at føra hana til Danmarkar vóru drignar frá, vóru bara 120 ríkisdálar eftir at gjalda niður upp á lánið, men á fíggjarlógini fyri 1855/56 varð skuldin hjá eiðismonnum avskrivað, og tá varð endaligt punktum sett fyri hesari skipaætlanini hjá eiðismonnum (Nolsøe 1984: 289).

Ætlanin við jaktini „Neptunus" hevði víst, at tað var skjótt hjá óroyndum monnum at taka skeivar avgerðir í sambandi við skipakeyp og rakstur, og torført var at koma burtur úr hesum avgerðum aftur. Reiðararnir høvdu eisini sæð, at tað var ikki so lætt at fáa fiskiskapin at bera seg, og tá ið teir heldur løgdu seg eftir farmasigling og handli við øðrum vørum enn fiski, fánaði stuðulin frá amtmanninum. Sjálvt um ætlanirnar við hesum skipinum kollsigldu, so høvdu reiðararnir fingið seg royndar sum fiskaútflytarar av bæði egnum fiski og fiskinum hjá øðrum, og teir høvdu eisini roynt seg sum handilsmenn, har teir keyptu bein til útflutnings og innfluttu rávøru til Føroya til víðari framleiðslu. Í hesum virksemi sínum høvdu teir søkt og fingið fleiri loyvi, sum gjørdu sítt til at bróta hol á einahandilsmúrin. Harumframt vísti verkætlanin við troyggjuframleiðslu úr íslendskari ull, at Handilsstjórnin og amtmaðurin høvdu heilt hvør sína fatan av føroyska samfelagnum, og tað elvdi javnan til tvídrátt millum teir báðar partarnar, tá ið støða skuldi takast til ynski frá teimum, sum royndu at finna nýggjar vinnumøguleikar.

### 14.3.3 Nólsoyingar byggja deksbát

Dagin eftir, at eiðismenn høvdu søkt um rentufrítt lán til keyp av deksfari, 8. apríl 1846, søktu nólsoyingarnir Poul Joensen, Joen Jacobsen og H.P. Johannesen um, at teir kundu fáa loyvi at selja sína vøru frítt og frítt at kunna keypa útgerð til tann deksbátin, sum teir vóru farnir undir at smíða. Eisini í hesi ætlanini kundi tað sæð út til, at teir skrivaðu umsóknina í tøttum samstarvi við Pløyen, tí hann gjørdi skjótt av og gav longu sama dag sítt viðmæli, har hann greiddi frá, at av tí, at kongligu fiskiroyndirnar og tær privatu fiskiroyndirnar í árinum vóru væl

304 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, nr. 1212b. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 5. januar 1852.

størri, enn tær vóru árið fyri, var áhugin av álvara kveiktur fyri havsins ríkidømi, og „Lysten til, at gaae udenfor det nuværende Baadsfiskeri, atter bleven vækket blandt Færøboerne.“

Pløyen kendi hesar tríggjar menninar sum ídnar og dugnaligar fiskimenn, og teir vóru longu farnir í gongd við at fáa eitt deksfar til vega. Av royndum vistu teir, at tað við einum slíkum fari ikki bar til at virka fiskin til stokkfisk, sum var høvuðsútflutningsvøra úr fiski úr Føroyum, men um teir fingu møguleikan frítt at selja fisk og keypa útgerð, so kundi ætlanin eydnast. Pløyen tók aftur til, at ein slík roynd eftir toski og hákelling við deksfari kundi fáa „særdeles stor betydning“ fyri alt fólkið, og tí viðmælti hann umsókniní[305].

Tað var upprunaliga Poul Joensen, sum á heysti 1845 tók stig til at byggja eitt lítið fiskiskip. Poul Joensen Nolsøe varð eisini nevndur Poul í Búð, og hann hevði eisini staðið fyri at byggja skonnartina, sum seinni fekk navnið „Nolsøe“, og hann var við í hetlandsferðini hjá Pløyen. Sjálvur hevði hann 1. november 1845 skrivað til amtmannin um, at teir vildu royna at sleppa undan at gjalda frakt av tilfarinum, sum teir høvdu bílagt til at smíða deksbátin. Pløyen fekk gjørt tað so, at teir sluppu undan hesum gjaldinum, men teir noyddust at gjalda frakt av viðinum, sum kom úr Noregi[306].

Bæði Rentukamarið og kongur tóku undir við amtmanninum, og 15. mai staðfesti kongur avgerðina at játta umsóknini frá nólsoyingum. Tað merkti, at teir í 3 ár fingu loyvi til at veiða allan fisk og havdýr, uttan grindahval, døgling og kóp, við báti sínum. Teir fingu eisini loyvi til at løna monnum, sum teir fingu umborð, við peningi og provianti, og teir fingu loyvi til at innflyta húkar, línur og aðra útgerð, umframt salt og bretti, sum skuldi nýtast í klippfiskaframleiðsluni, men teir skuldu fylgja øllum reglum, sum vóru ella fóru at verða galdandi um Kongliga handilin, og teir skuldu geva amtmanninum frágreiðingar um, hvussu gekst við fiskarínum, eins og fútin skuldi sleppa at kanna skipið, áðrenn tað fór av landinum við vøruni, so tryggjast kundi, at eingin ólóglig vøra fór við tí. Tá ið skipið kom aftur til Føroya, skuldi tað koma beint á Havnina, so fútin kundi tryggja sær, at bara lóglig vøra kom heim aftur við skipinum (Nolsøe 1984: 304–305).

Sjálvt um henda umsóknin varð játtað, gekst striltið at fáa skipið liðugt. Ein orsøk var helst, at meslingarnir gingu í 1846, og ein onnur orsøk var helst eisini, at peningur vantaði í. Í øllum førum søkti „et Interessantselskab paa Øen Nolsøe“ í juni 1847 um 500 ríkisdálar í láni[307]. Í viðmerking til umsóknina segði amtmaðurin, at teir vóru farnir undir at smíða deksfarið, sum teir høvdu fingið loyvi til at fiska við, men útreiðslurnar av at gera alt klárt vóru størri, enn

305 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 383. Viðmæli til nólsoyingar dagfest 8. apríl 1846.

306 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 338. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 3. november 1845.

307 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 181. Fylgibræv frá amtmanninum við umsókn frá nólsoyingum.



*Jógvan Jacobsen í Lon var ein av nólsoyingunum, sum í 1846 søktu um at fáa rentufrítt lán til sluppina, sum teir vóru farnir undir at byggja. (Mynd: Føroya Siglingarsøga 1)*

nólsoyingar vóru førir fyri at gjalda[308]. Rentukamarið avgjørdi 31. juli, at tað vildi hava neyvari upplýsingar um skipið, áðrenn tað kundi viðgera umsóknina neyvari[309]. Amtmaðurin greiddi nólsoyingunum frá svarinum og segði, at tað merkti, at teir skuldu greiða frá, hvussu skipið sá út, hvussu stórt tað var o.s.fr., og hvat endamálið var við tí, sum skuldi gerast afturat. Gjørdu teir tað, var ein møguleiki fyri, at teir kundu fáa lán upp á helvtina av tí upphædd, sum skuldi brúkast til at gera skipið liðugt og reiða tað út. Tó kundu teir í mesta lagi fáa 500 ríkisdálar[310].

Summarið 1848 varð skipið liðugt bygt. Tað fekk navnið „Haabet" ella „Friheds-Haab", og tá var tað ein slupp á 16 tons. Sluppin var 19 alin long og 6 ¾ alin breið, og hon kostaði 1400 ríkisdálar at byggja (Nolsøe 1984: 303). Tá ið sluppin var liðug, fingu nólsoyingar Suðuroyar-Dánjal at føra hana, og teir fóru at royna undir Føroyum (Nolsøe 1984: 305). Á heysti 1848 kom norska timburskipið „Mercurius" úr Kragerø til Føroya við timburi, og teir vildu sleppa at keypa klippfisk frá nólsoyingum heim aftur við. Amtmaðurin helt, at nólsoyingar høvdu fingið slíkt loyvi, og tí játtaði hann, at norski skiparin keypti

308 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, ad. nr. 181. Bræv til Rentukamarið dagfest 21. juni 1847.

309 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 92. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannin dagfest 31. juli 1847.

310 TSS. Færø Amt. Kopibók AA, bræv nr. 182. Bræv til Poul Nolsøe, Joen Jacobsen og Hans Paula Johannesen dagfest 6. oktober 1847.

tey 14 lispundini, sum nólsoyingar høvdu fingið við deksbátinum[311]. Hetta var kortini ikki væl móttikið í Innanríkismálaráðnum, sum legði áherðslu á, at slíkur handil ikki mátti koma fyri aftur, tí avleiðingin kundi skjótt gerast, at norðmenn og aðrir fremmandir fóru at handla ólógliga við føroyingar (Nolsøe 1984: 305).

Í august 1848 søktu nólsoyingarnir aftur Rentukamarið um at fáa lán til skipið. Hesa ferð søktu teir um 1400 ríkisdálar, og teir søktu eisini um at fáa loyvini, sum teir høvdu fingið í 1846, longd. Harumframt søktu teir um at sleppa at innflyta vørur „til andres Forbrug", sum t.d. timbur úr Noregi, steinkol, epli og proviant, og til at útflyta aðra vøru enn fisk, so sum bein, ljós og ullvørur. 3. februar 1849 svaraði Innanríkisráðið, at tað tíverri ikki kundi játta nakað lán og heldur ikki kundi geva loyvi til at innflyta vørur til onnur. Hinvegin hevði tað einki ímóti, at loyvið frá 1846 varð flutt soleiðis, at loyvistíðin byrjaði, tá ið skipið fór undir at fiska, og tað kundi eisini loyva, at skipið útflutti hvala- og djórabein, men ikki ljós og ullvørur, tí tað hevði verið ov stórt „Indgreb i den kongelige Handel" (Nolsøe 1984: 306).

At tað hvørki bar til at fáa meira lán ella at fáa fleiri rættindi var eitt vónbrot hjá nólsoyingunum, sum í mai 1849 sendu eina nýggja umsókn um at fáa nakrar broytingar í teimum loyvunum, sum teir høvdu fingið. Stutt eftir, at teir høvdu sent umsóknina, fóru teir sjálvir á gátt hjá amtmanninum, og har boðaðu teir frá, at teir fóru at lata bátin liggja á landi, til viðurskiftini broyttust til teirra fyrimun. Amtmaðurin royndi at tosa teir frá at lata „Mismod" steðga sær, tí Innanríkisráðið arbeiddi við málinum. Annars vildi amtmaðurin ikki gera so nógvar viðmerkingar til ynskini og grundgevingarnar hjá nólsoyingum, tí tey samsvaraðu rættiliga væl við tað, sum amtið so ofta fyrr hevði skrivað til Rentukamarið. Tí endaði amtmaðurin bara brævið við at boða frá, at hann av heilum hjarta tók undir við ynskjunum hjá nólsoyingum[312]. Innanríkisráðið vildi tó ikki ganga við til at geva fleiri loyvi (Nolsøe 1984: 307).

„Haabet" var í 1850 til fiskiskap við 4 monnum, og í juli fóru teir til Hetlands við fiskinum og hvala- og djórabeini. Teir komu heimaftur ein góðan mánað seinni og høvdu tá fiskin heim aftur við sær, tí teir sluppu ikki av við hann. Harumframt høvdu teir frakt av ymiskum slagi. Hvat síðani hendi við skipinum, vita vit ikki nógv um, men dagbókin er varðveitt fyri árini 1854-63, og í henni sæst, at teir 1854 og 1855 fiskaðu undir Føroyum og sigldu millum oyggjarnar fyri Kongliga einahandilin. Tá ið fríhandil kom í 1856, sigldi „Haabet" bara fyri M.C. Restorff, handilsmann í Havn, og hann keypti helst skipið árið eftir (Nolsøe 1984: 308).

### 14.3.4 Mikkjal í Kristnastovu

Ein av teimum føroyingunum, sum var við kongliga royndarskipinum „Hanne &

---

311 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 297. Bræv til Rentukamarið dagfest 5. november 1848.

312 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 314. Bræv til Rentukamarið dagfest 1. mai 1849.

Marie" í 1845, var Mikkjal Joensen í Kristnastovu í Havn. Mikkjal hevði á ungum árum verið yvirjekari, men stutt eftir, at úthandil kom í Vestmanna, gjørdist hann 2. betjentur har. Í juli 1842 varð hann fluttur suður í úthandilin á Tvøroyri, har hann arbeiddi við at taka ímóti og flýggja út vørur. Um nýggjársleitið 1845-46 flutti Mikkjal aftur til Havnar og gavst í handlinum. Áðrenn Mikkjal flutti til Havnar, hevði hann keypt ein seksæring í Porkeri fyri 80 ríkisdálar, og henda bátin ætlaði hann at umbyggja til havfiskiskap (Nolsøe 1984: 291).

Mikkjal sendi eina umsókn um lán til at leggja dekk í skutirnar á bátinum, so hann kundi sigla til havs, og manningin kundi hava neyðuga verju og pláss til hvíld umborð. Pløyen sendi umsóknina um lán og loyvi til at selja fisk og keypa útgerð frítt víðari til Rentukamarið 11. juni 1846. Pløyen helt, at Mikkjal átti at hava rætt til lánsmøguleikan í Forordning frá 20. apríl 1836, og Mikkjal átti eisini jørð at seta í veð. Hann visti kortini ikki so nógv um prísin á útgerð, at hann kundi úttala seg um nyttuna í at fáa loyvi til at keypa frítt, men hann ivaðist ikki í, at tað var stórur fyrimunur fyri umsøkjaran, um hann slapp at selja virkaðan klippfisk, har hann fekk besta prísin. Í handlinum fingust 3 skillingar fyri pundið ella 10 ríkisdálar fyri skippundið. Var fiskurin væl virkaður, kundu 16 til 18 ríkisdálar fáast fyri hann í Keypmannahavn. Hann helt, at um báturin var egnaður til tað, so skuldi Mikkjal fáa loyvi til at fara við fiskinum og taka útgerð til bátin heim aftur við sær[313].

Áðrenn Rentukamarið kundi taka støðu til, um tann tilsøgnin, sum varð givin føroyingum í resolutión frá 20. apríl 1836, kundi veitast Mikkjali, vildu teir hava amtmannin at fáa til vega upplýsingar um støðd og „beskaffenhed" av farinum, sum skuldi hava sett dekk í, hvør útgerð var neyðug og hvør proviantur, og um hvar jørðin, sum Mikkjal ætlaði at seta í veð, var, og hvussu stór hon var[314]. Mikkjal fekk tí onki lán í fyrsta umfari, og tí endaði tað við, at hann lænti 1200 ríkisdálar privat frá Jens Paula Heinesen í Sandavági, har hann setti 12 gyllin í veð.

Veturin 1846-47 broytti Mikkjal bátin til ein deksbát, og 21. apríl 1847 váttaði Pløyen, at talan nú var um ein deksbát, sum leyk treytirnar í reglugerðini frá 20. apríl 1836. Báturin var tá í gerð, so ilt var at meta um siglingarevnini, men Pløyen helt, at „det kan vel i Almindelighed antages, at en Baad, som er omdannet til et Skib, ikke vil blive en god Seiler, ligesom det er øiensynligt, at dette Skib ikke har nogen smuk Facon." Men sjálvt um talan ikki var um nakran penan bát, so var tað týdningarmiklasta, at hann egnaði seg til at fiska við, og tað høvdu tveir av skiparunum hjá handlinum váttað, at deksbáturin hjá Mikkjali gjørdi. Sambært dagbók C. M. Olsens varð deksbáturin flotaður 23. mars 1847 (Nolsøe og Jespersen 2009: 312).

Mikkjal hevði sjálvur koyrt meginpartin av ognum sínum í bátin, so tað var vantandi, at hann fór at leggja nógv fyri at fáa raksturin at hanga saman. Tí

313 TSS. Færø Amt. Kopibók Y, bræv nr. 402. Bræv til Rentukamarið dagfest 11. juni 1846.
314 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra R, bræv nr. 1037. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannin dagfest 21. november 1846.



*Sáttmálin, sum Mikkjal í Kristnastovu gjørdi við fimm havnarmenn 3. mai 1847. (Mynd: Tjóðsavnið 8779F077)*

var tað eisini so umráðandi, at Mikkjal fekk stuðul til at reiða bátin út. Pløyen mælti 21. apríl 1847 til at stuðla honum beinanvegin[315]. Tá var Mikkjal klárur at fara til fiskiskap, og 3. mai undirskrivaði hann ein sáttmála við teir fimm havnarmenninar, sum skuldu manna bátin. Tveir dagar seinni fór „Rojndin“ sín fyrsta túr. Bæði sáttmálin og skipsbókin fyri árið 1847 eru endurgivin í *Føroya Siglingarsøgu 1* (Nolsøe 1984: 295–301).

Hetta summarið avreiddi Mikkjal 1635 fiskar, sum vigaðu umleið 34 skippund. Fyri hesa veiðuna fekk hann 122 ríkisdálar, men útreiðslurnar til løn og kost til manningina var 234 ríkisdálar, so sjálvt um fiskiskapurin var toluligur, so var undirskotið stórt. Umframt hesar útreiðslur komu rentur av láninum frá Jens Paula Heinesen (Nolsøe 1984: 301).

315 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 155. Bræv til Rentukamarið dagfest 21. apríl 1847.

Við hesum vánaliga úrslitinum sá Mikkjal sær ikki nógvar aðrar møguleikar enn aftur at søkja almennu myndugleikarnar um lán, og tað gjørdi hann á heysti 1847. Amtmaðurin sendi umsóknina víðari og viðmerkti, at Mikkjal hevði sett jørð í veð í sambandi við umbygging av bátinum, og hann helt ikki, at Mikkjal kláraði at seta meira jørð í veð, so at hann megnaði at liva upp til treytirnar frá Rentukamarinum um trygd í jørð. Mikkjal var sera óheppin í fiskarínum í 1847, og amtmaðurin roknaði ikki við, at Mikkjal megnaði at reka bátin víðari til komandi summar, um hann ikki fekk lán frá Rentukamarinum, men „dersom han saaledes skulde nødes til at forlade den begyndte Næringsvei, vilde han gerade i en meget beklagelig Stilling."

Góðu úrslitini hjá øðrum deksførum og møguleikin at fáa lán høvdu eggjað honum til at royna seg, og hann hevði sett alt, hann átti, í verkætlanina. Mikkjal var einkjumaður við fýra børnum, tað elsta teirra 11 ára gamalt. Noyddist hann at realisera bátin frá sær, fóru tíðindini um, at lán ikki fekst til henda bátin, at ferðast, og tá fór virðið á bátinum at lækka, um tað yvirhøvur fór at eydnast at sleppa av við hann. Samanlagt gjørdu allar hesar umstøður, at amtmaðurin mælti til at stuðla Mikkjali[316].

Rentukamarið helt fast í, at tað skuldi hava pant í fastari ogn, og tað tók sína tíð at fáa Rentukamarið at broyta hugsan. Í apríl 1849 avgjørdu myndugleikarnir endiliga at lata Mikkjali lánið, sum hann hevði søkt um, men tá var Mikkjal so illa fyri, at hann megnaði ikki at liva upp til lánstreytirnar. Hann átti kortini bátin, tá ið hann doyði 7. september 1851 bara 40 ára gamal. Børn hansara arvaðu bátin, men í januar árið eftir rak „Royndin" á land og gjørdist vrak (Nolsøe 1984: 302).

## *14.4 Innanríkisráðið vildi ikki stuðla*

Í pørtunum omanfyri sást, at tað gekst illa at fáa lán til skip í 1848 og árini eftir tað, sjálvt um skipanir frammanundan vóru settar í verk at stuðla teimum, sum ætlaðu sær at royna fiskivinnu í Føroyum. Júst árstalið 1848 er áhugavert, tí tað ger tað rættiliga upplagt at siga, at orsøkin til hesa broyting í almenna hugburðinum var, at Innanríkismálaráðið, sum var partur av nýggja fólkaræðinum, yvirtók føroysku málini frá Rentukamarinum hjá einaveldiskongi. Fyri fólkaræðið var liberalur handil ein sjálvfylgja, og tí var skipanin við einahandli ein andsøgn í sjálvum sær, og tí skuldi einahandil sjálvandi avtakast sum skjótast. Henda støða kom longu í 1830-árunum til sjóndar á Stættatingi, sum greitt er frá í kapitli 7.5, og hon gjørdist uppaftur greiðari, tá ið Fólkatingið fekk spurningin til viðgerðar, sum greitt verður frá í komandi kapitli. Teir, sum sendu umsókn um lán til fiskivinnuroyndir eftir 1848 fingu tí eina øðrvísi móttøku, enn aðrir høvdu fingið frammanundan. Í hesum partinum verða tríggjar slíkar ætlanir umrøddar.

316 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 234. Bræv til Rentukamarið dagfest 16. desember 1847.


Jacob Andreas Lunddahl,

Thorshavn, den 7de Mai 1847.

*Nolsøe handilsforvaltari fekk 7. mai 1847 loyvi frá fútanum at brúka "Ebenezer" til fiskiskap. (Mynd: Tjóðsavnið 8779F073)*

**14.4.1 Handilsforvaltarin vil fiska við „Ebenezer"**

Í 1848 keypti Einahandilin eina jakt, nevnd „Fortuna", at flyta vørur við. Tað gjørdi, at handilin ikki longur hevði brúk fyri deksbátinum „Ebenezer", sum Nolsøe handilsforvaltari hevði fingið smíðað til síns sjálvs í 1839. Einahandilin hevði brúkt henda deksbátin sum flutningsfar, og sum greitt er frá í 10. kapitli, elvdi tað til illgruna um, at Nolsøe á henda hátt tryggjaði sær persónliga eina trivaliga eykainntøku frá handlinum, hann var settur at stýra.

Tá ið Einahandlin ikki longur hevði brúk fyri „Ebenezer", fór deksbáturin aftur at fiska. Nolsøe fekk longu fiskiloyvi frá fútanum 7. mai 1847, men óvist er, um hann brúkti tað tá. Í 1848 gjørdu teir 4 túrar og fingu 2850 toskar og 5 tunnur av havkellingalivur, men inntøkurnar vóru ikki nóg stórar til at klára útreiðslurnar.

Í 1849 søkti handilsforvaltarin tí aftur um at sleppa at fiska hákelling og tosk við „Ebenezer" og nú eisini um at sleppa at selja veiðuna, har sum hann vildi. Sum altíð var amtmaðurin sera positivur um slíka ætlan, og hann segði, at „Fiskeriets Drift med Dæksfartøier her fra Færøe er af en indgribende Vigtighed for en videre Udvikling af denne Provindses oeconomiske Forhold", og tá ið hann ikki ivaðist í evnunum hjá handilsforvaltaranum, og at hann tí kundi koma at virka sum „et opmuntrende Exempel for andre velhavende Indvaanere her paa Landet", mælti hann til at játta umsókníni[317].

317 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 305. Bræv til Rentukamarið dagfest 6. mars 1849.

Umsóknin varð kortini havnað, og grundgevingin var, at hann sjálvur var forvaltari í handlinum, og tí var hansara uppgáva, at „vaage over, at der ikke gøres Indgreb i Handelens Rettigheder og Interesser, og saaledes har at paase, at de Bevillinger, der er meddelt Private til Fiskeris Drift under Øerne og hvad dermed staar i Forbindelse ikke misbruges“. Tí var tað ikki hóskandi, at hann sjálvur tók lut í slíkum virksemi (Nolsøe 1984: 247).

Hvat víðari hendi við „Ebenezer“, er ógreitt, men í 1858 keypti M.C. Restorff hana fyri 300 ríkisdálar til sítt vaksandi handilsvirksemi í Havn. M.C. Restorff brúkti hana bara til farmaflutning (Nolsøe 1984: 249).

**14.4.2 Jóhan Michael Müller ætlanir um deksfar**

Í desember 1849 fekk amtmaðurin aftur eina umsókn um at fáa nøkur serrættindi í sambandi við eina ætlan um at fáa til vega eitt deksfar til fiskiskap. Hesa ferð var tað Jóhan Michael Müller, sum hevði eina slíka ætlan. Amtmaðurin sendi umsóknina víðari og skrivaði til Innanríkisráðið um málið, og hann greiddi frá, at Müller vildi hava loyvi til at keypa fiskireiðskap, salt og tilfar til tunnur og til at selja sín fisk, har sum hann hevði hug til, um tað so var til Hetlands ella til fronsk fiskiskip. Sum vant ivaðist amtmaðurin ikki sjálvur í, at hetta var eitt tiltak, sum var vert at stuðla, tí „dersom Færingerne nogensinde skulle kunne haabe at see de her nu existerende Handelsforhold forandrede saaledes, at Monopolets Ophævelse skal kunne blive til sandt Gavn for Beboerne“, so áttu teir at fáa alsamt fleiri rættindi, so at fólk vandust við ein meira sjálvstøðugan handil.

Amtmaðurin helt, at Jóhan Michael Müller ætlaði sær undir sildaveiðu, og hann vísti á, at sjálvt um Müller hevði fiskað við egnum báti í eini tvey ár og átti fitt av peningi, so var henda vinnan so kapitalkrevjandi, at hann átti at fingið allar tær sømdir, sum tað almenna kundi veita. Viðvíkjandi at selja fiskin til fronsk fiskiskip var amtmaðurin kortini ikki so positivur, tí tað kundi lættliga føra til loynihandil, og vandust føroyingar við at selja fremmandum fiskin, so fóru tað eisini at verða teir, „som saa væsentligst vilde komme til at høste Fordelen af Beboernes Flid.“ (Nolsøe 1984: 317–319).

Innanríkisráðið hevði einki ímóti at geva Jóhan Michael Müller somu rættindi, sum onnur skip høvdu fingið, men Jóhan Michael man hava funnið út av, at hetta var eitt ov tungt tak at taka einsamallur. Í øllum førum søkti hann aftur í mai 1851 um at fáa fíggjarligan stuðul til sildaveiðu, og at hann kundi sleppa undan avgjøldum upp á tilfar, sum skuldi brúkast í sildavinnuni, og hann vildi eisini sleppa at selja sildina, har sum hann vildi, og senda sildina til Keypmannahavnar við handilsins skipum avgjaldsfrítt. Amtmaðurin helt, at so nógv sild var í Føroyum, at ein slík vinna uttan iva hevði verið skilagóð. Harumframt hevði Jóhan Michael summarið 1850 verið í Hetlandi fyri at læra seg ymiskt um vinnuna, men amtmaðurin helt seg kortini ikki til at viðmæla at lata honum fíggjarligan stuðul, annað enn at lata hann flyta vøru við handilsins skipum avgjaldsfrítt. Tað var eisini niðurstøðan í Innanríkisráðnum, sum sostatt ongan fíggjarligan stuðul

læt til ætlanina[318] (Nolsøe 1984: 320). Teir, sum hava kannað málið, hava einki sæð til, at Jóhan Michael Müller nakrantíð fór undir sildavirksemi. Hinvegin var hann ein av teimum allarfyrstu, sum fingu handilsloyvi, tá ið fríhandilin kom, og eftir øllum at døma hevði hann fitt av handli við hetlendingar tá (Nolsøe 1984: 321).

**14.4.3 Vágamenn søkja**

Í 1851 kom ein onnur umsókn frá vágamonnum, sum ætlaðu at keypa sær skip. Teir vildu hava loyvi til at avreiða og innflyta, har teir høvdu hug til, og skipakeypið var treytað av, at teir fingu slíkt loyvi. Í sínum viðmæli av hesi umsóknini segði amtmaðurin, at hann onga orsøk sá til, at vágamenn skuldu fáa betri treytir enn aðrir føroyingar. Harumframt hevði hann kunnað umsøkjararnar um, „at Spørgsmaalet om den færøiske Handels Frigivelse netop for Tiden er Genstand for Regjeringens Overveielse og at denne Sag formeentlig snart vil blive definitivt afgjort.“ 4. juli svaraði Innanríkisráðið, at tað „ikke har fundet Grund til at bevilge det Ansøgte“ (Nolsøe 1984: 322)[319].

## *14.5 Samandráttur*

Henda síðsta viðmerkingin er eitt greitt tekin um, at so hvørt sum tað gjørdist greitt, at Einahandilin fór at verða avtikin, fánaði áhugin fyri at stuðla fiskivinnuætlanum. Hugburðurin um, at ein komandi fiskivinna skuldi menna føroyingar til at taka ímóti fríum handli hvarv, tí fríur handil var sjálvsagdur lutur í fólkaræðisliga samfelagnum.

Áðrenn tað kom so langt, stuðlaðu bæði Pløyen og Dahlerup amtmaður øllum fiskivinnuætlanum av fullum huga, m.a. við at mæla til at lata 500 ríkisdálar í láni, sum lagt varð upp til í fyriskipanini frá 20. apríl 1836, og seinni við at mæla til, at teir, sum royndu seg við deksbátum, fingu serrættindi av ymsum slag, sum vóru víðari, enn skipanin við einahandli í veruleikanum loyvdi. Rentukamarið tók vanliga undir við tilmælunum hjá amtmonnunum, men viðhvørt tók tað eisini atlit til afturhaldandi viðmerkingar frá Handilsstjórnini. Stuðulin gjørdi sítt til, at fleiri ætlanir vórðu royndar, og tær, sum eru umrøddar í hesum kapitlinum, vístu á ymsan hátt, at tað var torført at bróta slóð fyri einari rættiligari fiskivinnu í Føroyum.

Fyri suðuroyingarnar við „Tveraa“ var tað ein trupulleiki, at Einahandilin ikki ordiliga var á sama spori sum myndugleikarnir og tí valdi at leggja upp fyri svinni við at taka sær umleið 8 % av avreiðingarvirðinum heldur enn at stuðla

318 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 875. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 4. juli 1851.

319 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 876. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 4. juli 1851.

nýggju royndunum. Aðrar royndir vístu, at tað kundi gerast sera kostnaðarmikið hjá føroyingum at fara undir vinnuligt virksemi, tí vantandi handilsroyndir gjørdu, at ov nógvar skeivar avgerðir vórðu tiknar. Royndirnar vístu eisini, at tann kapitalurin, sum skuldi til at fáa rakstur í eitt fiskiskip, var væl størri, enn ein vanligur føroyingur, sum leitaði eftir nýggjum tilverugrundarlagi, megnaði at bera. Tí eydnaðist eingin av teimum føroysku royndunum væl, men tær gjørdu, at fleiri fingu sínar fyrstu royndir á sjónum, og tær vístu eisini á nýggjar avleiddar møguleikar, t.d. at innflyta ull til virkingar. At enda gjørdi hugurin at stuðla fiskivinnuætlanum við serrættindum, at fleiri og fleiri hol komu á einahandilsmúrin, og tað var við til at gera tað lættari at avtaka hann í 1856.

Ein, sum hvørki vantaði royndir ella kapital, var A.W. Skibsted, sum virkaði sum keypmaður í Frederikshavn. Hann fekk fótin fyri seg í Føroyum við hákellingaveiðu, men skjótt mentist virksemi hansara til aðrar vinnutættir. Fyri at lætta um avgjørdi hann at skráseta seg sum føroying, og amtmaðurin roknaði hann sum einasta kappingarneytan hjá Einahandlinum. Tí legði hansara handilsfyritøka áhaldandi trýst á einahandilsskipanina, og tað gjørdi sítt til at vísa, hvussu ótíðarhóskandi skipanin var. At Skibsted var komin so væl fyri seg sum vinnulívsmaður, fekk stóran týdning, tá ið ognir og virksemi hjá Einahandlinum skuldi privatiserast, og sostatt var hann í hvussu er ein beinleiðis sambindingarliður ímillum politiskt stuðlaðu fiskivinnuroyndirnar í 1840-árunum og menningina av føroyskari fiskivinnu, eftir at fríhandilin var innførdur.

Skibsted fekk sær í 1851 fleiri úthandlar á sama hátt, sum fyrstu stóru handilsfyritøkurnar seinni gjørdu, eftir at fríhandil var komin. Á tann hátt slóðaði hann fyri, hvussu handilsvirksemi í Føroyum fór at verða skipað. Samstundis gjørdu hesir úthandlar, at tey, sum róku teir, lærdu eitt sindur um handilsvirksemi. Tað var nakað av tí, sum saknur var í hjá teimum, sum upprunaliga mæltu til at fyrireika føroyingar til fríhandil, so á tann hátt kom eisini nakað ítøkiligt burtur úr at stuðla privatum fiskivinnuroyndum fyri at fyrireika føroyingar. Í kapitli 16 verður greitt frá, at í hvussu er onkur av hesum úthandilsmonnunum hjá Skibsted fekk týdning, tá ið privat fólk fóru at taka ímóti fiski og framleiða hann til klippfisk undir einahandilsskipanini, og soleiðis var tað eisini eitt úrslit av strembanina at stuðla privatari fiskivinnu.

# 15. kapittul
# *Drúgv politisk viðgerð um avtøku av Einahandlinum*

So skjótt sum Stættatingini fóru undir virksemi sítt í 1830-árunum, var greitt, at stórur munur var á, hvat byrjandi fólkaræðið helt um Einahandilin í Føroyum og hugsanina hjá einaveldiskongi og umsiting hansara. Hesin hugsjónarligi munurin gjørdi, at politikararnir ikki rættiliga skiltu ætlanirnar um at fyrireika føroyingar, so at teir vóru klárir, áðrenn Einahandilin kundi avtakast, tí í teirra eygum var Einahandilin nógv størsta og kanska einasta orsøkin til, at støðan var, sum hon var.

Hugsjónarligi munurin kom til sjóndar í nevndini, sum í 1840 viðgjørdi føroyska handilin. Nevndin kom til ta niðurstøðu, at Einahandilin í Føroyum átti at verið avtikin, men onkursvegna kom Rentukamarið í resolutión 15. mai 1844 fram til, at handilin kortini skuldi halda fram. Rentukamarið helt framvegis fast í fyrireikingarvegnum. Grundgevingarnar vóru, at fólkatalið í Føroyum var ov lítið, og „det ubetydelige Omfang af dets Produktioner vilde lægge store Vanskeligheder i Vejen for Frihandelen". Skuldu føroyingar og statsins fíggjarligu og handilsligu áhugamál ikki koma illa fyri av fríhandlinum, helt Rentukamarið, at tað var neyðugt at kanna, hvussu handilin kundi leysgevast fyri danskar borgarar, uttan at privat monopol komu í staðin fyri Einahandilin (Mortensen 1955: 73).

Misnøgd við avgerðina hjá Rentukamarinum gjørdi, at spurningurin varð tikin upp politiskt. Stættatingið viðgjørdi føroyska handilin bæði í 1844 og 1846 og kom fram til at heita á kong um at gera eina lóg um avtøku av Einahandlinum til næsta Stættating. Stættatingið kom ongantíð saman aftur, og kongur og øll tann danska skipanin hevði nógv annað enn føroyska handilin at hugsa um hesa tíðina í endanum á 1840-árunum, og spurningurin um fríhandil í Føroyum mátti tí bíða, til nýggja skipanin, sum varð bygd upp á Grundlógina frá 1849, var farin at virka. Fólkatingsins fíggjarnevnd tók spurningin um føroyska handilin upp í 1851, og øll viðgerðin aftaná vísir, at nýggja politiska skipanin var samd um at avtaka Einahandilin. Spurningurin var bara, hvussu víðfevndur fríhandilin skuldi verða, og í øðrum lagi, hvussu staturin kundi tryggja seg ímóti óneyðugum tapi.

Í hesum kapitlinum verður hugt at allari teirri politisku gongdini í spurninginum um avtøkuna av Einahandlinum. Roynt verður at vísa á, hvussu fyrireikingarnar, sum vóru gjørdar undir einaveldinum, ávirkaðu politisku viðgerðina, og hvønn týdning ein komandi fiskivinna hevði fyri støðutakanina hjá ymisku pørtunum í málinum.

## *15.1 Avtøka av Einahandlinum fyri Stættatingið*

Avgerðin hjá Rentukamarinum í 1844 at ganga ímóti tilmælinum frá teirri nevndini, sum í 1842 mælti til fullan fríhandil í Føroyum, elvdi uttan iva til misnøgd frá í hvussu er teimum, sum í nevndini høvdu arbeitt fyri at koma fram til hesa niðurstøðu, og tað var henda misnøgdin, sum førdi til, at einahandilsspurningurin kom fyri Stættatingið aftur í 1844.

**15.1.1 Berøring med Udverdenen Vehikel for Udvikling af Culturtilstanden**
Lítið er at ivast í, at Pløyen var ein av teimum, sum var vónbrotin av, at Rentukamarið ikki fylgdi tilmælinum, og tað var helst eisini hann, sum fekk grosserer Hans Peter Hansen at leggja málið um avtøku av Einahandlinum fyri Stættatingið. Í øllum førum komu orð Pløyens greitt til sjóndar, tá ið Hans Peter Hansen legði málið fram 1. november, tí í grundgevingunum fyri uppskotinum vóru tað serliga brot úr bókini um hetlandsferðina, sum vórðu nýtt.

Hans Peter Hansen fekk í 1840 borgaraheitið grosserer, og hann var ein virkin handilsmaður í Keypmannahavn. Í 1846 gjørdist hann stjóri í Nationalbankanum, og árini 1835 til 1846 umboðaði hann Keypmannahavn á Stættatingi (*Dansk biografisk Lexikon, tillige omfattende Norge for Tidsrummet 1537-1814, bind VI* 1887: 629–632). Í framløgu síni undraðist hann á, at Einahandilin framvegis var til, sjálvt um fleiri nevndir gjøgnum tíðirnar høvdu mælt til at avtaka hann. Hann ivaðist als ikki í liberalistisku grundhugsjón síni, tí hann helt, at tað var púra greitt, at ein almennur handil ongantíð fór at kunna verða rikin „med den Fordeel, som den vil kunne drives af Private.“ Harumframt hevði hann frá fleiri av embætismonnunum, sum vóru sendir til Føroya, hoyrt, at fríhandil fór „i høj Grad at ville bidrage til Landets Opkomst“, og tí helt hann tað vera rætt at taka málið upp á Stættatingi (Stænderforsamling Roskilde 1844, kol. 1636).

Restin av framløguni vóru ymisk brot úr bókini hjá Pløyen, og við teimum grundgav hann fyri at seta fram uppskotið um, at „Forsamlingen vil indgaae med en allerunderdanigst Petition til Hs. Majestæt Kongen, at den nuværende Monopolhandel paa Færøerne maatte ophæves, og Frihandelen paa disse Øer tilstedes under nærmere fastsættende Betingelser.“ (Stænderforsamling Roskilde 1844, kol. 1637).

Jákup Thorsteinsson helt í ritgerð síni um Føroya støðu til Danmarkar 1834-52, at Hansen sum handilsmaður helst hevði áhugamálini hjá handilsstættini í Keypmannahavn fremst í huga (Thorsteinsson 1990: 118), men lítið bendir á tað, tí handilsáhugamál vórðu als ikki nevnd í grundgevingum hansara. Tí er heldur talan um, at hann var talsmaður hjá teimum embætismonnunum, sum hann vísti til í framløgu síni.

Fyrsti maður at taka orðið í viðgerðini av málinum var føroyska umboðið Niels Hunderup, sum hevði verið sorinskrivari í Føroyum og eisini verið limur í nevndini, sum viðgjørdi handilin í 1840-42. Tað einasta, hann hevði upp á hjarta,

*William Frederik Duntzfeldt ivaðist ikki í, at samband við umheimin var besti mátin at menna mentanarstigið í Føroyum. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



var at siga, at hann var vísur í, at hetta málið hevði „meget stor og indgribende Betydning for hele den danske Handelsstand", og tí mælti hann til, at málið fór til eina nevndarviðgerð (Stænderforsamling Roskilde 1844, kol. 1638).

Hesum var Duntzfeldt, sum eisini var keypmaður í Keypmannahavn, samdur í, men hann helt kortini, at tað serliga vóru atlitini til føroyingar, sum áttu at vera fremst í huga. Hann ivaðist ikki í, at „en nærmere Berøring med Udverdenen er det største Vehikel for en større Udvikling af Culturtilstanden." Sjálvur hevði hann havt høvi at práta við ein embætismann, sum hevði arbeitt í nøkur ár í Føroyum, og frá honum hevði hann fingið vissu fyri, at føroyingar „i Cultur saa langt fra at staae tilbage for Folk her i Landet – jeg taler naturligviis kun om almeen Mand - endog staae paa et høiere Trin, end det i Almindelighed er Tilfældet her med Folk i en lignende Stilling." Hann ásannaði, at skiftistíðin frá einahandli til fríhandil kundi gerast torfør, men soleiðis var við øllum skiftum til størri frælsi, og tí kundi tað ikki vera nøkur orsøk til at steðga á (Stænderforsamling Roskilde 1844, kol. 1638–39). Fyri Duntzfeldt var eingin munur í menningarstigi millum føroyingar og danir, og tí var heldur eingin orsøk at halda fast í, at føroyingar skuldu fyrireikast. Duntzfeldt var ikki einsamallur um hetta sjónarmiðið, sum merkti, at ongin orsøk var at halda fast í statsins parti av javnvágsfelluni.

Umboðsmaður kongs vildi ikki ráða frá at seta eina nevnd at viðgera spurningin, sjálvt um fleiri nevndir gjøgnum tíðina høvdu viðgjørt hann. Tað var langt síðani avgjørt at avtaka Einahandilin, men tá vóru føroyingar ímóti tí. Nú vóru kortini fleiri tekin um, at henda hugsanin var broytt. Hesum var Duntzfeldt samdur í,

tí hann hevði fingið at vita, at tað var eitt „Temmelig almindeligt" ynski millum føroyingar at avtaka Einahandilin. Hunderup tók eisini undir við tí, tí meðan hann arbeiddi í Føroyum, var „Stemningen i Almindelighed for frie Handel", men hann hevði hoyrt, at henda støðan var broytt aftur. Hunderup helt kortini ikki, at støða føroyinga kundi vera so avgerandi, tí føroyingar vóru ikki so væl førir fyri at taka støðu, tí teir høvdu livað við Einahandlinum í øldir. Plesner próstur var tann síðsti at taka orðið, og hann hevði frá einum føroyingi hoyrt, at bæði hann sjálvur og fleiri av hansara landsmonnum hildu, at tað hevði verið til gagns, um fríur handil varð innførdur (Stænderforsamling Roskilde 1844, kol. 1640–41).

Tá ið orðaskiftið var liðugt, varð ein nevnd sett at viðgera spurningin, og í hana vóru Hunderup og handilsmenninir Hansen og Meinert valdir. Nevndarálitið minti mest av øllum um ein samandrátt av stóra álitinum hjá nevndini, sum arbeiddi við føroyska handlinum 1840-42. Sostatt virkaði hetta álitið hjá stættatingsnevndini sum millumliður, sum flutti gamla álitið inn á politiska pallin.

Stættatingsnevndin helt ikki, at tað bar til at fyrireika fríhandilin, og hon helt, at orsøkin til, at stjórnin ikki var komin á mál við sínum fyrireikingum enn, skuldi „efter Comiteens Mening søges i Forholdene selv, idet man under det bestaaende Monopol har villet fremkunstle en Udvikling af Landets Erhvervskilder, som kun ene er mulig under frie Forhold, altsaa efterat Monopolet er ophævet." Harafturat helt nevndin, at tær „Betænkeligheder", sum higartil høvdu steðgað fríhandlinum, høvdu lítlan týdning (Stænderforsamling Roskilde 1844, kol. 4056).

Henda støðan hjá nevndini var greitt brot við almenna politikkin hjá embætisverkinum í fleiri ættarlið, og hon er eitt týðiligt dømi um, at tað fyrr so framburðshugaða embætisverkið undir seina einaveldinum kom at tykjast afturhaldssinnað, tá ið fólkaræðið vann seg fram í 1840-árunum. Nú var ikki longur nakar hugur at nýta nógva orku upp á at fyrireika átøk, tí politiska tiltrúgvin upp á liberalistisku hugsjónirnar var nóg góð grundgeving í sjálvum sær.

Nevndin sá stórar møguleikar í menning av bæði seyðahaldi og ikki minst fiskivinnu, og hon nevndi eisini sildafiskiskap og kolavinnuna í Suðuroy, men ongin av hesum vinnumøguleikum fór at mennast, fyrr enn handilin varð fríur. Tí vónaði nevndin, at hon hevði prógvað, at „Handelens Frigivelse i høi Grad vil være i Færingernes egen Interesse, med Hensyn til de materielle Fordele og den høiere Civilisation, som derved vil blive dem til Deel." Niðurstøðan var púra greið, og hon var, at handilin skuldi gerast fríur (Stænderforsamling Roskilde 1844, kol. 4062).

Tá henda niðurstøðan var gjørd, fór nevndin undir at viðgera, hvussu Einahandilin kundi avtakast. Nevndin frá 1842 helt, at handilin skuldi latast upp fyri øllum tjóðum, men tí tók stættatingsnevndin ikki undir við. Hon var varnari og var samd við Rentukamarið um, at í fyrstu syftu skuldi handilin bara latast upp fyri dønum. Í allar aðrar mátar fylgdi nevndin tilmælinum frá 1842. Nevndin mælti stættatinginum til at venda sær til kongs og biðja um, at eitt

lógaruppskot um frían handil í Føroyum varð lagt fram á komandi stættatingi (Stænderforsamling Roskilde 1844, kol. 4068).

Nevndarálitið varð undirskrivað 5. desember og lagt fram 11. desember 1844, men tað kom ongantíð til viðgerðar í Stættatinginum, tí tingið hevði so nógv onnur átroðkandi mál at taka støðu til. Hinvegin vísti álitið púra greitt, at millum teir fólkavaldu var als ongin ivi um at avtaka Einahandilin. Teirra politisku hugsjónir lótu ongan iva vera um tað rætta í frælsinum, og øll fyrivarni, sum embætismenn í áratíggju høvdu havt, vórðu skúgvað av borðinum. Eftir stóð mestsum bara spurningurin, um handilin skuldi verða heilt fríur ella bara fríur fyri danskar borgarar.

### 15.1.2 Stættatingið viðger málið í 1846

Hans Peter Hansen legði málið um fríhandil í Føroyum fram aftur á Stættatingið 18. juli 1846. Hann vísti bara til ætlaðu samtyktina frá 1844 og segði, at „det ikke mindre nu end dengang egner sig til at tages under Overveielse." (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 246). Ein nevnd varð sett at viðgera spurningin. Í hana komu somu limir, sum høvdu verið í nevndini í 1844, og teir vístu í áliti sínum bara á nevndarálitið frá 1844 og søgdu seg í einum og øllum standa inni fyri tí (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 800).

#### *15.1.2.1 Fiskivinna fór ikki at gerast grundarlag undir føroyskum búskapi*

Áðrenn málið kom til fyrstu viðgerð í Stættatinginum, var niðurstøðan av fiskivinnuroyndunum hjá kongi komin, og eisini í hesum kjakinum merktist, at semja ikki var millum embætismenn í Danmark og embætismenn í Føroyum um, hvussu úrslitið av fiskivinnuroyndunum skuldi tulkast. Kongligi umboðsmaðurin á Stættatingi var Peter Georg Bang, sum seinni fekk stóra ávirkan á málið um avtøkuna av Einahandlinum, tí hann gjørdist bæði innanríkis- og forsætisráðharri. Á Stættatingið umboðaði hann eisini Rentukamarið, og tað var hansara uppgáva at leggja fram støðu stjórnarinnar.

Í framløgu síni vísti Bang aftur, at stjórnin á nakran hátt skuldi vera ímóti fríum handli, sum Hunderup hevði pástaðið, og hann segði eisini, at tað var „en Vildfarelse" at halda, at statskassin hevði nakran fyrimun av handlinum. Hann helt, at nevndin í áliti sínum hevði misskilt stjórnina, tá ið hon helt, at stjórnin var ímóti fríum handli. Stjórnin hevði bara viljað bøtt um støðuna í Føroyum, so leingi Einahandilin var. Týdningarmiklasti parturin av hesi stremban vóru royndirnar at menna eina fiskivinnu, og tá ið stjórnin ikki enn hevði tikið stig til at avtaka Einahandilin, so var tað fyrst og fremst, tí at hon hevði

> Ønsket at skaffe Færingerne den Dygtighed i Fiskeriet paa det aabne Hav, som de savnede; man har derfor begunstiget private Expeditioner, og draget Omsorg for, at Færinger derved kunde blive antagne som Lærlinger; man har for den kongelige Kasses Regning udsendt Skibe under Bestyrelse af en af de meest agtede Kjøbenhavnske Kjøbmænd, men destoværre – og det spaaer ikke



*Peter Georg Bang var kongsins umboðsmaður á Stættatingi 1846, og hann var eisini embætismaður í Rentukamarinum. Á tingi staðfesti hann, at Rentukamarið ikki roknaði við, at nógv fór at koma burtur úr einari føroyskari fiskivinnu.*
*(Mynd: Kongliga bókasavnið)*

> godt for Comiteens sangvinske Forhaabninger -, Udbyttet har baade for de private og for de for kgl. Regning udsendte Skibe i det hele hidtil været ringe, og Mænd, der ere nøie bekjendte med Forholdene, finde det meget tvivlsomt, om Fiskeriet under Færøerne, navnlig Torskefiskiet, nogensinde vil komme i Sammenligning med Fiskeriet under Island. (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 821)

Rentukamarið hevði uppgivið at fáa fiskivinnuna menta í Føroyum, og tað kom at merkja hugsanina hjá stjórnini, tí fríhandilin kom so ikki at tann hátt, sum myndugleikarnir upprunaliga hugsaðu sær. Seinni í røðuni hjá kongsins umboðsmanni kom vónbrotið av fiskivinnuroyndunum enn greiðari til sjóndar, tá ið hann segði:

> Det har navnligen hidtil næsten været umuligt, at bevæge Færingerne til i længere Tid at blive ombord i Dæksskibene; dertil have de ikke Udholdenhed nok, og jeg troer overhovedet ikke, at de ville bringe noget Stort ud af Fiskerierne, ligesom jeg tvivler paa, at de kjøbenhavnske Handlende ville foretrække Fiskeriet under Færøerne for det islandske. (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 823).

Hunderup var ikki fegin um, at kongsins umboðsmaður hevði kallað nevndina sangvinska, tá hon væntaði stóran vøkstur í framleiðsluni í Føroyum, tá ið fríhandilin kom. Hann hevði 9 ára royndir í Føroyum, og hann helt, at føroyingurin var nógv broyttur, síðani hann fór haðani, um tað nú var soleiðis, at tað ikki bar til at fáa teir at vera umborð á deksførum. Hunderup visti, at føroyingar iðraðu

seg um, at teir einki skip áttu, og gjøgnum tíðirnar høvdu fleiri fingið sær skip. Onkur av teimum fór allan vegin til Keypmannahavnar, og undir krígnum høvdu teir loyvi at sigla upp á Ongland. Orsøkin til, at hesar royndir miseydnaðust, var, at „de ei kunde afholde sig fra Smugleri og Indgreb i Monopolhandelen“. (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 1003).

Hunderup var als ikki samdur við kongsins umboðsmann um, at fiskivinnu-royndirnar vóru miseydnaðar, tí tað samsvaraði ikki við hansara royndir. Hann vísti á, at ein vinnulívsmaður í Keypmannahavn hevði gjørt væleydnaðar royndir, og royndir vóru eisini gjørdar úr Frederikshavn, sum vóru so væl eydnaðar, at teir eisini høvdu sent skip upp í 1846 (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 846).

Longu í síni framløgurøðu segði Hunderup, at tá ið fríhandilin kom, fór høvuðsvinnuvegurin at verða fiskivinna, „og at her er en vid Mark for Industriel Virksomhed er vistnok aldeles ubestrideligt.“ Men einki fór at henda í so máta, fyrr enn fríhandilin var komin (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 819). Kongligi umboðsmaðurin helt, at nevndin við sínum úttalilsum fór at geva føroyingum falskar vónir um fyrimunirnar við fríhandli, og „det er synderligt, naar han venter sig saa meget af Færingernes Fiskeri, da det dog ikki er ham ubekjendt, at Islænderne, efter 30 Aars Frihandel og efter mange Forsøg, endnu ikke have været at bringe til at give sig af med Dæksfiskeri af nogen Betydenhed.“ (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 847).

Sjálvt um umboðsmaður kongs ávaraði ímóti ov stórum vónum til eina komandi fiskivinnu, so helt hann, at tað mest avgerandi fyri framtíðina var, at føroyingar fóru at sigla við egnum skipum. Tí var hann ímóti, at danskir handilsmenn fingu einarætt til handil í Føroyum, tí tað fór at forða føroyingum í at sigla sjálvir, og tað hevði so aftur keðiliga ávirkan á menningina av eini fiskivinnu. Fingu føroyingar møguleikan at sigla til Hetlands at keypa og selja, fóru teir skjótt at fáa hug at fiska við somu deksførum, sum hetlendingar gjørdu, og at enda fóru teir sjálvir at megna at sigla til Danmarkar, „som dog efter Forholdenes Natur altid vilde komme til at drive den største Handel paa Færøerne.“ Bara á tann hátt fóru føroyingar at fáa nakran fyrimun av fríhandlinum (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 825).

Eisini grosserer Andreas Hansen[320], sum hevði verið limur umboðandi handils-stættina í nevndini 1841-42, ávaraði um, at vónirnar fyri einari føroyskari fiskivinnu vóru falskar. Hann helt, at um nøkur vón skuldi vera fyri eini fiskivinnu, so skuldi ógvuliga nógvur peningur nýtast til at vinna á mongu forðingunum, men føroyingar høvdu ongan slíkan kapital, og hann væntaði ikki, at nakar danskur vinnulívsmaður hevði hug at fara undir hesa uppgávuna. Hesa hugsan sína bygdi hann á bretsku royndirnar, har stjórnin hevði brúkt fleiri milliónir pund til at stuðla sildafiskiskapi, og tað var tí, at fiskivinna var komin fyri seg í Hetlandi og Skotlandi. Slíkar íløgur komu neyvan upp á tal í Føroyum, og tí var ikki

320 Talan má vera um Andreas Nicolai Hansen, ið seinni gjørdist formaður í grosserersocietets Komité og soleiðis leiðari av keypmannahavnsku handilsstættini.

væntandi, at fiskivinna fór at fáa nakran serligan týdning (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 828–29).

Hans Peter Hansen helt ikki, at nevndin hevði gjørt sær falskar vónir um fyrimunirnar við fríhandli, men hann helt hinvegin, at stjórnin hevði gjørt sær falskar vónir um at kunna seta gongd í eina fiskivinnu undir Einahandlinum, tí „det ligger i Sagens Natur, at slige Foretagende ikke lykkes paa anden Maade, end naar de fremstaae af Individernes egen Drift, og af Bestræbelse for at erhverve sig Noget, men at de aldrig blive til Noget, naar de kun ere Experimenter for andre." Hann ivaðist als ikki í, at fríhandilin fór at gera, at bæði fiskivinna og aðrar vinnur fóru at vaksa (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 837).

Økt framleiðsla var ein avgerðandi grundgeving hjá nevndini fyri, at ongin orsøk var at óttast fyri vantandi kapping í Føroyum, men tá nú stjórnin hevði so lítlar vónir til vøkstur í fiskivinnuni, var spurningurin, um henda grundgevingin kundi nýtast longur. Kongligi umboðsmaðurin ivaðist stórliga í, um roknast kundi við nakrari øktari framleiðslu fyrstu 8 til 10 árini eftir avtøkuna av Einahandlinum (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 823). Onkrir tinglimir vóru samdir við honum, men eingin av teimum mælti kortini til at steðga avtøkuni av Einahandlinum. Hinvegin gjørdi fatanin hjá stjórnini av, at fiskivinna ikki fór at fáa so stóran týdning í Føroyum, at ein komandi fiskivinna ikki fylti so nógv frameftir í viðgerðini av, hvussu Einahandilin kundi avtakast.

#### *15.1.2.2 Ymiskar metingar um menningarstig*

Undir viðgerðini av tilmælinum frá nevndini kom menningarstig føroyinga nakrar ferðir upp at venda, men sum heild merktist einki til, at tinglimir hildu nakran vansa vera við tí. Duntzfeldt tók m.a. spurningin fram og helt, at um talan var um grønlendingar ella eskimoar, sum „i høi Grad manglede den fornødne Civilisation", var støðan ein onnur, tí tað var fleiri ferðir nevnt, at føroyingar vóru væl upplýstir og á fleiri økjum betur fyri enn danska almúgan (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 835–36).

Meinert, sum var ein av trimum nevndarlimum, svaraði Duntzfeldt og segði, at nevndin ikki ivaðist í, at tað var rætt, sum Duntzfeldt hevði sagt, men viðvíkjandi handilsevnum lýsti hann føroyingar sum blindar, og hann helt, at „naar man opererer en Blind, tillader man ham ikke strax at træde frem i det fulde Dagslys, han maa først opholde sig en Stund i et skummelt Kammer."(Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 844)

Við hesari útsøgn síni, sum minnir nógv um Waiting-room of history hjá Chakrabarty, sum greitt er frá í kapitul 2.3, vildi Meinert eisini grundgeva fyri nevndarinnar tilmæli um, at tað í fyrstu syftu bert vóru danskir ríkisborgarar, sum kundu gagnnýta fríhandilin. Hetta samsvaraði væl við tað, sum Hunderup hevði sagt um, at endamálið við at geva donskum handilsmonnum einarætt eina tíð, var fyrst og fremst at fyrireika føroyingar og ikki so nógv fyri at geva donskum

*Nicolai Jonathan Meinert var ein av limunum í stættatingsnevndini, sum viðgjørdi føroyska handilin. Hann lýsti føroyingar sum blindar og helt, at tað var týdningarmikið, at føroyingar vandu seg við ljósið í einum skýmligum kamari, áðrenn teir stigu heilt út í dagslýsið. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



áhugamálum ein fyrimun. Sjálvur helt Hunderup, at nóg mikið var at hava eina slíka skiftisskipan í eini 2 ella 3 ár (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 820).

Hugsanirnar vóru ymiskar um henda spurningin, og mest víðgongdur var Direktør Duntzfeldt, sum tók sær rætt til at leggja fram broytingaruppskot í fyrra lagi um, at handilin skuldi gerast fríur fyri allir tjóðir beinanvegin, og í øðrum lagi í seinasta lagi innan 3 ár. Hann nýtti m.a. søguna um ætlaða fríhandilin í 1790 sum dømi um týdningin av at áseta eina greiða freist (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 839). Hesin spurningurin var tann einasti, sum ósemja var um, so hann fylti nógv, tá ið onnur og endaliga viðgerðin var 13. august. (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 999).

Nevndin hevði umrøtt henda spurningin millum viðgerðirnar, men hon helt fast í síni støðu, tí tað var best fyri føroyingar, at teir vóru eitt sindur vardir í skiftistíðini, og tað var eisini gott fyri danskt vinnulív, at teir ikki skuldu kappast við restina av heiminum beinanvegin (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 1004).

Duntzfeldt var fremsti talsmaður ímóti at hava eina slíka skiftisskipan. Hann helt, at tá ið Føroyar ikki kundi roknast sum koloni, so høvdu føroyingar rætt til somu frælsi, sum fólk í restini av statinum hevði. Hann helt eisini, at nevndin var eitt sindur tvítýdd, tá ið hon segði, at føroyingar vóru til reiðar at taka ímóti fríhandli, men samstundis mælti til at hava eina skiftisskipan fyri at verja teir. Hann tók aftur í myndamálið hjá Meinert um, at føroyingar vóru blindir og máttu verjast beint eftir viðgerðina. Duntzfeldt helt ikki, at føroyingar vóru

blindir, tí hann helt teir hava eitt „skarpt og godt Syn“. Skuldu nú atlit aftur takast til at verja føroyingar, kundi úrslitið gerast, at teir ikki fingu møguleika at gagnnýta ætlaðu ágóðarnar av at avtaka Einahandilin (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 1011).

Aðrir, sum tóku orðið, vístu á, at serrættindi til danir í eini skiftisskipan hevði týdning, tí serliga bretar vóru nógv sterkari í einari fríari kapping, og tí var vandi fyri, at teir fóru við øllum handlinum, áðrenn danskt vinnulív fekk fótin fyri seg. Harumframt óttaðust teir eisini fyri, at bretsk áhugamál fóru at keypa ognirnar hjá Einahandlinum í Føroyum, og tí var ein skiftisskipan í hvussu er ynskilig, til ognirnar vóru realiseraðar (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 1016). Umboðsmaður kongs vildi helst ikki hava, at nakað stóð í áheitanini um eina skiftisskipan, tí so stóð tað stjórnini frítt at taka tey atlit, sum hon helt vera neyðug. Tí mælti hann til at býta áheitanina í tveir partar og atkvøða fyri teimum hvør sær (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 1018).

#### *15.2.1.3 Avtøkan av Einahandlinum partur av størri heild*

Tá ið viðgerðin var liðug, var orðingin „at Forsamlingen allerunderdanigst vil petitionere hans Majestæt Kongen om, at den næste Stænderforsamling maa blive forelagt et Lovudkast, sigtende til den færøeske Handels Frigivelse“ einmælt samtykt við 60 atkvøðum fyri. Restin av orðingini „at derved de af Comiteen i 1844 fremsatte Bemærkninger maatte komme under allerhøieste Overveielse“ varð samtykt við 39 atkvøðu fyri og 21 ímóti. Uppskotini hjá Duntzfeldt fullu bæði, tí ávikavist bara ein og tveir tinglimir atkvøddu fyri teimum báðum uppskotunum (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. 1024).

Uppskotið um avtøkuna av Einahandlinum var ikki tað einasta málið, sum viðvíkti Føroyum, sum var fyri í Stættatinginum í 1846. Jákup Thorsteinsson hevur í doktararitgerð síni viðgjørt nøkur av hinum, og hann skrivar m.a. um, at 28 føroyingar søktu um, at eitt fólkating varð sett á stovn í Føroyum. Undir viðgerðini av tí uppskotinum varð ført fram, at ein orsøk til, at tað ikki kundi viðmælast, var, at „Færøernes beboere, som ikkun udgøre cirka 7000 individer, består udelukkende af simple, for højere dannelse blottede, almuesfolk, og en repræsentation, udvalgt af deres midte, ville upåtvivleligen savne den fornødne indsigt og dygtighed, som må være til stede i en stænderforsamling.“ Var talan hinvegin um at seta á stovn kommunur í Føroyum, var tað í lagi, „da færingerne er et besindigt og forstandigt folk, behøver man ikke at nære nogen tvivl om, at de ville vide at afbenytte denne større selvstændighed på en værdig og for det heles vel gavnlig måde.“ (Thorsteinsson 1990, kol. 111–112)

Hetta er eitt týðiligt dømi um, at metingin av menningarstøði føroyinga var ógvuliga ymisk, og spurningurin er, um metingin ikki mest av øllum var ávirkað av, um metarin tók undir við ella var ímóti málinum, sum var til viðgerðar. Í hvussu er vísa hesar orðingar, at metingarnar um menningarstøði í Føroyum mest av øllum var ein subjektiv meting við støði í aktuella málinum.



*Stættatingið í Roskilde samtykti í 1846 at venda sær til kongs við áheitan um at leggja lógaruppskot um avtøku av Einahandlinum í Føroyum fram, næstu ferð Stættatingið kom saman. (Mynd: wikicommons)*

Eitt annað mál, sum Stættatingið samtykti, var spurningurin um at avtaka partar av § 8 í lógini frá 1777. Her var talan um at avtaka sonevnda giftingarbannið, og tað vóru prestarnir í Føroyum, sum høvdu tikið málið upp. Slíkar persónligar avmarkingar samsvaraðu ikki væl við tíðarandan, so tað var ongantíð nakar ivi í, at Stættatingið fór at mæla til at avtaka regluna, men í sínum endaliga tilmæli kom eisini at standa, at tá ið tingið nú samstundis hevði mælt til at avtaka Einahandilin, so kundi tað ikki gera annað enn „fremme de gode og afværge de befrygtede skadelige Følger af den nu foreslaaede Forandring.“ (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. LXV)

Í nevndarálitinum um avtøkuna av giftingarbanninum er eitt áhugavert brot, sum lýsir, hvussu fleiri ymisk mál Føroyum viðvíkjandi hingu saman. Nevndin skrivaði:

> Den omhandlede Indskrænkning synes at være et Led i Kjæden af de færøske Forhold, saa at det kunde befrygtes, at man ved øieblikkeligen at afskaffe samme, muligt vilde fremkalde Forhold, som for Øerne vilde være mere trykkende. Det antages derfor af Nogle for rettest at udsætte denne Sag indtil andre Forandringer i den færøeske Lovgivning gjorde det tilraadeligt at afskaffe forommeldte med flere forældede Indretninger. Det turde forøvrigt antages, at dette Tidspunct ikke vilde være fjernt; der er saaledes allerede af Regjeringen givet Anledning til Udvidelse af Fiskerierne ved Færø. Det er fremdeles paatænkt i indeværende Aar at paabegynde Ordningen af de færøeske Landboforhold samt dermed tillige de færøeske Næringsveie, og naar først i disse og andre Retninger de Hindringer ere bortryddede, som stille sig i Veien for den friere Udvikling, vilde hint Forbud tilligemed flere andre forældede Bestemmelser enten bortfalde af sig selv eller i alt Fald uden Betænkelighed kunne ophæves. (Stænderforsamling Roskilde 1846, kol. LXXXVII)



*21. mars 1848 gingu millum 15.000 og 20.000 fólk kravgongu av Gammeltorv til Christiansborg, har tey kravdu, at kongur gekk við til at lata frá sær valdið sum einaveldiskongur. (Mynd: wikicommons)*

Forðingarnar fyri einari modernisering í Føroyum vóru fleiri, og tær vóru leinkjaðar saman í eina ketu í fleiri liðum. Henda myndin er ikki ólík myndini um javnvágsfelluna. Í viðgerðini av fleiri føroyskum málum sást, at spurningurin var ikki, um modernisering skuldi fremjast í Føroyum, men heldur hvør liður skuldi loysast fyrst. Sambært hesari útsøgnini hevði stjórnin valt at byrja við at menna eina fiskivinnu í Føroyum, og onnur vinnulig átøk vóru á veg. Eydnaðust hesi átøk, fóru aðrar avoldaðar fyriskipanir at falla mestsum av sær sjálvum. Ætlanin hjá stjórnini var greið, men spurningurin var, um hon fór at bera á mál.

## *15.2 Grundlógartingið vildi avtaka Einahandilin*

Eftir at stættatingið í 1846 hevði samtykt at biðja kong koma við uppskoti um avtøku av Einahandlinum, hoyrdist onki aftur alment um málið, og heilt aðrar umstøður gjørdu, at Stættatingið ongantíð kom saman aftur. Øll politiska skipanin í Danmark varð kollvelt í mars 1848, og tá ið Danmark við grundlógini varð skipað sum eitt fólkaræði, hvarv spurningurin um handilin í Føroyum í øllum rokanum. Pløyen umboðaði Føroyar sum kongsvalt umboð á grundlógargevandi tinginum, sum fór undir virksemi sítt í oktober 1848.



*Málningur av grundlógargevandi tinginum, sum Constantin Hansen málaði í 1860-árunum. Fremst á myndini eru fleiri av kendastu politikarunum frá grundlógararbeiðinum, men onkustaðni í mongdini eru amtmenninir báðir Christian Pløyen, sum var kongsvalt umboð fyri Føroyar, og Carl Emil Dahlerup, sum umboðaði Estrup í Randers amti. Møguliga hava teir fingið høvi til at tosa um framtíðina í Føroyum millum fundirnar í Keypmannahavn. (Mynd: wikicommons)*

Undir viðgerðini av § 69 í grundlógaruppskotinum, har tað var ásett, at „Alle Indskrænkninger i den frie og lige Adgang til Arbeide, som ikke ere begrundede i det almene Vel, skulle hæves ved Lov", spurdi Pløyen, um tað so eisini merkti, at avmarkingarnar í fríum handli í Føroyum vóru avtiknar, tá ið henda greinin í grundlógini varð samtykt. Orðførarin svaraði beinanvegin, at nevndin, sum hevði gjørt uppskotið, ikki hugsaði sær, at tað fekk avleiðingar fyri skipanir, sum longu vóru galdandi, men um tað kundi ávísast, at slíkar avmarkingar vóru ósambæriligar við „det almene Vel", so kundi tað avgreiðast við lóggávu seinni.

Hetta var svarið, sum Pløyen roknaði við at fáa, og tí gjørdi hann seg út til at siga meira um málið, men formaðurin steðgaði honum beinanvegin og segði, at málið ikki hoyrdi til hesa lógargreinina. Pløyen royndi aftur at taka orðið, men formaðurin steðgaði honum aftur, tí tað kundu verið so nógv „Detailspørgsmaal" at viðgjørt, tá ið vinnuviðurskifti vóru umrødd, men hann helt ikki, at tað var rætt at gera tað har. Tað fekk Pløyen til at siga: „Jeg maa tillade mig at bemærke, at der er saa faa Anledninger, ved hvilke jeg kan tale den Landsdeels Sag, som jeg repræsenterer, at jeg ikke troer at burde lade nogen gaae ubenyttet." Tí lovaði hann, at hann fór at seta eitt broytingaruppskot fram til § 86, um nevndin ikki

hevði viðgjørt, hvussu handilin í útnorðurlondunum skjótast gjørligt kundi frígerast við lóg (Rigsdagen 1848, kol. 2597–98).

§ 86 var ein áseting um, at Ríkisdagurin skjótast gjørligt skuldi taka stig til at samtykkja ymiskar lógir. Henda lógargrein var ikki við í upprunaliga uppskotinum til grundlóg, men í nevndararbeiðinum varð hildið, at neyðugt var við eini slíkari fyribils áseting. Upprunaliga vóru 10 lógir nevndar í greinini um so umfatandi viðurskifti sum m.a. fólkakirkjuna, „Næringsforholdenes Ordning“ og prentfrælsi. Fyrsta punktið í greinini var um, at lóg skuldi gerast um koloniirnar og stýringina av teimum, og tað var hesin parturin, sum fekk Pløyen til at royna at fáa avtøkuna av Einahandlinum við. Nevndin var ikki sinnað at taka føroyska einahandilin við, og tí legði Pløyen sjálvur fram uppskot um, at lóg skuldi gerast „Om Ophævelsen af Handelsmonopolet paa Færøerne“.

Undir viðgerðini av hesum uppskotinum segði Pløyen, at hann ikki vildi órógva tingið við at greiða frá orsøkini til, at broyting skuldi gerast við handlinum í Føroyum, tí hann ivaðist ikki í, at tað var øllum greitt, at slíkar avmarkingar ikki bóru til í longdini. Í kjakinum tóku teir, sum nevndu handilin, undir við Pløyen. Professarin í søgu, Frederik Schiern, helt als ongan iva vera um, at semja var í tinginum um at avtaka Einahandilin, men hann helt kortini ikki, at tað var rætt at seta í Grundlógina, hvørjar lógir tingmenn í framtíðini skuldu arbeiða við (Rigsdagen 1848, kol. 3390). Frederik Barfod segði, at tað hevði verið eitt vónbrot, um tingið ikki samtykti uppskotið hjá Pløyen. Hann helt, at Einahandilin var sera skaðiligur og einasta orsøk til, at Føroyar hevði eitt fólkatal, sum var fleiri ferðir minni enn fólkatalið í Orknoyggjum og Hetlandi (Rigsdagen 1848, kol. 3391). Bernard Rée og Carl Mundt stuðlaðu eisini uppskotinum hjá Pløyen, men stóri spurningurin í kjakinum var, um ein lógargrein av hesum slag, sum ásetti, hvørjar lógir komandi ting skuldu arbeiða við, var fólkaræðisliga rættvís.

Tá ið tingið atkvøddi fyri hvørt av teimum 11 punktunum í lógini, fall uppskotið um at gera lóg fyri koloniirnar, men tey flestu vóru samtykt. Teirra millum var uppskot Pløyens um at gera lóg um at avtaka Einahandilin í Føroyum. Tað varð samtykt við 61 atkvøðum fyri og 36 ímóti. Beint eftir varð atkvøtt um samlaðu lógargreinina, og hon fall við 73 atkvøðum ímóti og 37 fyri (Rigsdagen 1848, kol. 3396). Sostatt fekk grundlógargevandi tingið víst sína hugsan um Einahandilin í Føroyum, men ásetingin kom ikki við í Grundlógina, tí samlaða lógargreinin, sum Einahandilin var ein lítil partur av, fólkaræðisliga og lógartekniskt ikki varð mett at vera hóskandi.

## *15.3 Ríkisdagurin avtekur Einahandilin*

Tá ið grundlógin varð kunngjørd 5. juni 1849, kundi staðfestast, at Kongligi einahandilin í Føroyum fór at liva longur enn sjálv einaveldisskipanin. Stembanin hjá kongsins embætismonnum at fyrireika føroyingar til avtøkuna av handlinum



*Carl Christian Alberti, pápi P.A. Alberti, sum seinni gjørdist so kendur í bæði føroyskari og danskari søgu, tók spurningin um Einahandilin upp í nýggja Fólkatinginum. Hann var limur í fíggjarnevnd Fólkatingsins, og tað var helst tí, at fíggjarnevndin legði spurningin um føroyska handilin fyri tingið. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

hevði ikki borið á mál, og spurningurin var, hvussu tað fór at gangast handlinum, nú hann var vorðin ogn hjá einari fólkaræðisligari stjórn.

Í fyrstu fólkatingssetuni tók Carl Christian Alberti spurningin um handilin í Føroyum upp. Hann fanst at roknskapinum hjá handlinum og segði, at avtøka av Einahandlinum fór at verða til fyrimuns fyri handilsstættina í Keypmannahavn, men meira hendi ikki í málinum ta ferðina (Steining 1949: 125).

### 15.3.1 Fólkatingsins fíggjarnevnd vil avtaka handilin í 1851

Carl Christian Alberti gjørdist limur í fólkatingsins fíggjarnevnd, og tað gjørdi helst sítt til, at málið um Einahandilin í Føroyum kom fram aftur, tá ið Fólkatingsins fíggjarnevnd viðgjørdi fíggjarlógina fyri fíggjarárið 1851-52. Undir hesi viðgerðini vísti nevndin á, at tveir einahandlar hoyrdu til Innanríkisráðsins part av fíggjarlógini. Fíggjarnevndin ásannaði, at endamálið við hesum handlum ikki bara var at fáa eina inntøku, men eisini „at yde Beboerne Fordelene af at staae under en civiliseret Stats Beskyttelse, og igjennem Administrationen at fremme deres aandelige og materielle Cultur." Hetta mátti virðismetast, og í Føroyum hevði staturin gjøgnum handilin virka fyri at „fremme Øernes Production og til at udbrede Oplysning og Religiøsitet."

Spurningurin var bara, um tað bar til at halda fram við einahandlum, og nú hoyrdust javnan klagur um handilin, og tær „maatte finde Gjenklang hos Enhver, som er gjennemtrængt af den nu saa almindelige Overbevisning om Frihandelens store Fordele." Fíggjarnevndin viðgjørdi á øðrum sinni landsins fíggjarlóg, og

tí „maa det synes paatængende nødvendigt, at komme til klarhed om den Plan, som maa ønskes fulgt ved Bestyrelsen af hine Bilande, hvis Vee og Vel af mange Grunde maa være det danske Folk magtpaaliggende.“

Fyri fíggjarnevndina vóru tveir spurningar viðkomandi at seta sær. Annar var, um einahandilsskipanin hevði flutt íbúgvarnar so langt fram materielt og andaliga, sum „de kunne have billig Fordring paa“, og hin var, um Danmark og statskassin hevði so stórar fyrimunir av hesum londunum, at tað „maa ansees for betænkeligt at foretage Forandringer,“ sum kundu minka um inntøkurnar („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 248 Anhang B). Viðvíkjandi fyrra spurninginum var lítil ivi um niðurstøðuna hjá nevndini, tí hon byrjaði lýsingina av Føroyum við at siga:

> Paa Færøerne findes et kraftigt, flittigt og lærvilligt Folk, som efter mangfoldige samstemmende Vidnesbyrd i Oplysning og Sædelighed ikke staaer tilbage for Almuen i Danmark eller de andre nordiske Riger, men som efter de samme Vidnesbyrd staaer særdeles langt tilbage i Kundskab om den rette Maade at benytte sine Productionskilder og i Dygtighed til at udvikle disse („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 249 Anhang B).

Viðvíkjandi Grønlandi var støðan ein heilt onnur, tí „den Befolkning, som lever der, staaer endnu paa saa lavt et Trin af aandelig Udvikling, at det neppe vilde være til dens eget Tarv, om den i den nærmeste Fremtid blev sat i fri Forbindelse med de civiliserede Nationer.“ („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 253 Anhang B). Sostatt helt fíggjarnevndin fast í uppfatanini av, at Føroyar og Grønland skuldu viðgerast á hvør sín hátt, tí menningarstigið var á einum so nógv lægri stigi í Grønlandi, enn tað var í Føroyum.

Nevndin greiddi frá, hvussu støðan var í Føroyum vinnuliga. Seyðahald var týdningarmiklasti vinnuvegurin, men tað var „i en høist ufuldkommen Tilstand“, og hjá fiskivinnuni, sum var hin vinnuvegurin, stóð ikki nógv betur til, sjálvt um myndugleikarnir høvdu „anvendt mange og tildels meget kostbare Bestræbelser for at ophjælpe dette.“ Enn høvdu føroyingar ikki ordiliga viljað lært seg at sigla við deksbátum, og tí megnaðu teir bara at reka „den forholdsvis mindre vigtige Fiskefangst, sum falder tæt ved Øernes Kyster, medens der i neppe 10 Miles Afstand findes Fiskebanker af overordentlig Rigdom, som nu kun benyttes af fremmede Nationer.“

Nevndin roknaði ikki við, at føroyingar fóru at gagnnýta hetta ríkidømið, fyrr enn fríari samband fekst við onnur lond. Tá kundu røttu mátarnir lærast, og við fríari handli fóru teir eisini at fáa „en tilstrækkelig Spore til at udvikle disse Kræfter.“ Verandi skipan steðgaði øllum „Kappelyst, og Opfindsomheden lammes; hele Befolkningen presses ind i en Form, som er tilpasset af Fremmede, og derfor maaske neppe kan siges at passe for endeel af dem, endsige, at den skulde kunne lempes efter Individualiteternes Mangfoldighed“. Stutt sagt helt nevndin: „Folket holdes i en Umyndighedstilstand, som er fordærvelig, fordi den

*Carl Emil Fenger greiddi grækarismessudag 1851 Fólkatinginum frá, hví fíggjarnevndin hevði lagt uppskot fram um at avtaka Einahandilin. (Mynd: kongliga bókasavnið)*



gjør det uimodtageligt for saa mange af Culturens Goder." („Rigsdagstidende" 1851, kol. 250 Anhang B). Sostatt flutti Einahandilin í Føroyum ikki longur føroyingar fram andaliga og materielt, men var tvørturímóti ein forðing fyri slíkari menning.

Fíggjarliga hevði kongsins umboðsmaður á stættatingi sagt, at ein avtøka av Einahandilinum í Føroyum ikki fór at vera ein missur fyri statskassan. Nevndin roknaði seg eisini fram til, at handilin síðstu seks árini ikki hevði verið til fyrimuns fyri statskassan, og tí var tað eisini fíggjarliga tað rætta at gera at realisera handilin so skjótt, sum tað bar til („Rigsdagstidende" 1851, kol. 253 Anhang B).

Tað kundi ikki gerast beinanvegin, tí ein lóg skuldi snikkast til, og eitt slíkt lógaruppskot átti at koma frá stjórnini. Kortini helt nevndin, at um stjórnin av álvara vildi hava fríhandil, var einki í vegin fyri, at Einahandilin varð avtikin í seinasta lagi við endan á árinum 1852. Tí skeyt nevndin upp, at Fólkatingið samtykti eina slíka avgerð („Rigsdagstidende" 1851, kol. 266 Anhang B).

#### *15.3.1.1 Fyrsta viðgerð á Fólkatingi*

Uppskotið hjá fíggjarnevndini var til fyrstu viðgerð í Fólkatinginum grækarismessudag saman við fleiri øðrum uppskotum hjá nevndini, og í framløguni hjá Carl Emil Fenger, sum legði fram vegna fíggjarnevndina, var eingin ivi um fyrimunirnar við fríum handli. Hann helt, at fríhandil var „en gammel Grundsætning, som gaaer igjennem det civiliserede Liv i dets Heelhed, og som

finder sin Anvendelse overalt, hvor Mennesket har hævet sig over den første Tilstand.“ Henda støða skuldi nú eisini galda í Føroyum („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6718). Fenger vísti á, at handilsskipanin í Føroyum var beint ímóti teimum báðum grundreglunum um frælsi at keypa vørur, har tær vóru bestar og bíligastar, og til at selja vørur, har mest fekst fyri tær. Fenger ivaðist ikki í, at meginparturin av fólkatingslimunum vóru samdir við honum í teimum liberalistisku fríhandilssjónarmiðunum, so hann valdi at leggja dent á tey tingini, sum kundu hugsast at tala ímóti fríhandli.

Fyrsta mótgrundgevingin kundi verið, at statskassin fór at missa eina inntøku, men hann helt ikki, at talan var um nakra inntøku, og tað hevði nevndin ávíst, sjálvt um uppsetingin av fíggjarlógini kundi geva eina aðra mynd. Handilin hevði helst einaferð givið góðar inntøkur, men soleiðis var støðan ikki longur. Hann gjørdi nógv við at útgreina, um handilin hevði givið yvirskot ella undirskot síðani Napoleonskríggini, og eitt áhugavert sjónarmið var, at hann helt, at handilin blómaði umleið 1840, men tá „indtraadte imidlertid et nyt Vendepunkt, idet man indsaae Nødvendigheden af at give den færøiske Handel visse Lettelser og Udvidelser.“ („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6723).

Ein onnur atfinning móti uppskotinum um at avtaka Einahandilin var, at ein slík avgerð ikki kundi takast, fyrr enn føroyingar høvdu fingið høvi at siga sína hugsan, og tí átti avgerðin at bíða, til føroyingar høvdu fingið valt sítt egna umboð á Fólkating. Fenger skilti hetta sjónarmið, men júst í hesum málinum helt hann, at tað var ógvuliga ósannlíkt, at nakað annað sjónarmið fór at koma úr Føroyum, enn at handilin skuldi avtakast. Harumframt helt hann, at spurningurin var líka so nógv ein danskur spurningur sum ein føroyskur, tí tá ið handilin var ein byrða hjá statskassanum, „ere vi alene fra vort Standpunkt allerede berettigede til at frasige os enhver Deeltagelse i enhver saadan, for kongelig Regning dreven, Handel.“ („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6724)

Hann helt sjálvur, at einki forðaði fyri at samtykkja uppskotið, tí allar neyvari avgerðir um, hvussu tað skuldi gerast, skuldu takast seinni. Til tað arbeiðið fór tað at koma væl við at fáa hjálp frá einum umboði úr Føroyum, og tað hevði Ríkisdagurin helst fingið, tá hann kom saman aftur komandi heyst. Fenger setti sær sjálvum retoriska spurningin, um tað var neyðugt við eini slíkari tingsamtykt, tá stjórnin allarhelst fór at arbeiða við málinum kortini. Tað helt hann, tí „Jeg maa, mine Herrer! Hertil svare, at der over den færøiske Handels Frigivelse synes at hvile en ond Stjerne“, tí handilin skuldi verið avtikin 50 ár frammanundan, men hevði yvirlivað fleiri nevndir og avgerðir síðani tá. Stættatingið hevði eisini í 1846 einmælt samtykt at avtaka handilin, men síðani tá hevði stjórnin einki gjørt við málið alment. Tað var fyri at tryggja sær, at okkurt nú fór at henda, at fíggjarnevndin vildi hava Fólkatingið at samtykkja at avtaka handilin („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6726).

Ongin mótmælti uppskotinum hjá fíggjarnevndini, og tá ið eingin annar tinglimur bað um orðið, atkvøddi tingið um at koyra málið til aðru viðgerð, og tað varð einmælt samtykt („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6730).

### *15.3.1.2 Rosenørn innanríkisráðharri greiðir frá støðu stjórnarinnar*

Undir fyrstu viðgerð var eingin at greiða frá støðu stjórnarinnar, tí at innanríkisráðharrin var upptikin á einum fundi um fíggjarlógina í Landstinginum. Innanríkisráðharri var Mathias Hans Rosenørn, sum stutt frammanundan hevði verið bæði stiftamtmaður og amtmaður í Íslandi. Rosenørn var til staðar, tá málið um Einahandilin kom fyri aftur 16. mars, og hann hevði við sær eitt broytingaruppskot um at broyta dagfestingina fyri avtøkuni av Einahandlinum til endan av fíggjarárinum 1852-53 heldur enn kaldendaraárinum. Um henda lítla broytingin varð gjørd, tók hann eisini undir við málinum („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6889).

Rosenørn fekk nú høvi at greiða frá støðu stjórnarinnar. Hann greiddi frá, at stjórnin var áhugað at gera nakað við handilin, men tað vóru ikki atlit til statskassan, sum høvdu størstan týdning. Heldur var tað at umskipa handilin til „Indbyggernes Fordeel“, sum lá fremst í huga. Áhugavert er at síggja, at innanríkisráðharrin staðfesti, at royndirnar at broyta handilin „i den senere Aarrække har antaget en saa conseqvent Charakteer, at deri vistnok kan antages at ligge en saadan Forberedelse til Indførelsen af Frihandel, som det vel er muligt at træffe.“ Tí hevði hann einki ímóti, at tingið samtykti uppskotið hjá fíggjarnevndini („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6889).

Ráðharrin hevði sett seg væl inn í søguna hjá Einahandlinum, og hann ásannaði, at fyriskipanin frá 30. apríl 1836 vísti, at ætlanin var at avtaka Einahandilin. Við hesi fyriskipan gav staturin nakrar fyrimunir frá sær, og úrslitið hevði víst seg at verða, at „Fordelen af Handelen er bleven ringere, hvorimod privat Erhverv i den følgende Periode har udviklet sig mere og mere paa Færøerne.“ Føroyingar vóru bara bundnir at handlinum við vørunum, sum stóðu á takstlistanum, tí við øðrum vørum var handilin fríur, og hann bleiv eisini „ikke saa ganske sjelden“ nýttur („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6890).

Við síðuna av handlinum høvdu einstakir menn fingið „betydelige Begunstigelser“, og á tann hátt var „opstaaet flere handlende blandt de indfødte Færinger.“ Ein danskur keypmaður hevði eisini búsett seg í Føroyum, eftir at hann hevði fingið ymisk serrættindi, og hann fiskaði við tveimum skipum og hevði „i det Hele en ikke saa ganske ringe Virksomhed“. Statskassin hevði stuðlað øllum hesum monnum væl og roynt at gingið teimum á møti við øllum ynskjum. T.d. var loyvi givið til at flyta inn allar kornvørur og ertrar avgjaldsfrítt, og síðsta heyst var eitt føroyskt skip, mannað við føroyingum, í Danmark og keypti rávøru til víðari framleiðslu í Føroyum. Soleiðis hevði stjórnin gjørt nógv fyri at fyrireika føroyingar til tann fríhandilin, sum mátti koma („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6893).



*Til aðru viðgerð av málinum um Einahandilin greiddi Mathias Hans Rosenørn frá, hvørja støðu stjórnin hevði til uppskotið um avtøku av handlinum. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Rosenørn vildi ikki gera so nógv við fíggjarligu atlitini, tí tað vóru ikki tey, sum vóru fremst í huga hjá stjórnini, og hann ivaðist heldur ikki í, at um ognirnar hjá handlinum vórðu seldar, so fóru renturnar av hesi inntøkuni at viga væl upp ímóti møguligum tapi av at avtaka handilin. Hinvegin helt hann, at lurtast skuldi eftir, hvat føroyingar ynsktu, og hann hevði skilt av teimum frágreiðingunum, sum vóru komnar, at meiningarnar í Føroyum vóru ymiskar. Eldri parturin av fólkinum vildi ikki hava fríhandil, men yngri parturin, sum „med et friskere Mod seer Fremtiden imøde“, vildi hava frælsari virkismøguleikar. Teirra millum vóru helst fleiri, sum kundu taka við, har Einahandilin slepti, men hvussu tað kundi tryggjast á besta hátt, hoyrdi ikki til tað kjakið, sum var um uppskotið hjá fíggjarnevndini. Um uppskotið bara snúði seg um at avtaka einarættin hjá Einahandlinum, helt innanríkisráðharrin, at tað kundi gerast áðrenn endan á fíggjarárinum 1852-53, men um ætlanin var at avtaka sjálvan handilin og realisera ognir hansara, so fór tað at krevja longri tíð, tí annars fór tað at elva til órógv í Føroyum („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6896).

Eingin annar bað um orðið á fundinum, og uppskotið varð 17. mars samtykt við 63 atkvøðum fyri og ongari ímóti („Rigsdagstidende“ 1851, kol. 6897). Nú var tað upp til Rosenørn innanríkisráðharra sjálvan at arbeiða víðari við málinum. Hann skuldi um somu tíð viðgera spurningin um fullan fríhandil í Íslandi, og 15. apríl legði hann íslendska málið fyri Statsráðið, tí hann vildi hava eina provisoriska lóg um frían handil setta í gildi. Orsøkin var, at misnøgdin við handilin var stór í Íslandi, og um stjórnin ikki gjørdi okkurt nú, kundi misnøgdin økjast. Altingið hevði eisini bæði í 1845 og 1849 biðið um at fáa broytingar í

handilsviðurskiftunum, og stjórnin hevði arbeitt við málinum síðani 1845, men var ikki komin á mál enn. Í statsráðnum tók eingin av hinum ráðharrunum undir við Rosenørn, so tað endaði alt við, at hann tók lógaruppskot sítt aftur (Jørgensen 1958: 241–245).

### 15.3.2 Innanríkisráðið ger lógaruppskot

Rosenørn innanríkisráðharri lá ikki leingi á boðunum, tí longu fjúrtan dagar seinni var ráðið til reiðar at senda málið um fríhandil í Føroyum víðari. 30. apríl 1851 sendi ráðið eitt bræv til Dahlerup amtmann í Føroyum og eitt til Figgjarmálaráðið. Í langa brævinum til Fíggjarmálaráðið var ongin spurningur settur við, um Einahandilin skuldi avtakast, ella um føroyingar vóru fyrireikaðir til fríhandil. Talan var bara um, hvussu viðurskiftini skuldu skipast við fríhandlinum, og tað var fyri tað mesta spurningurin um, hvørjar inntøkur skuldu koma í staðin fyri vinningin av Einahandlinum, og hvussu hesar inntøkur kundu krevjast inn.

Rentukamarið hevði í síni tíð arbeitt við eini inntøkuskattaskipan í Íslandi, men Pløyen amtmaður hevði mælt frá at fara undir nakað líknandi í Føroyum, tí beinleiðis skattur var púra ókendur, og tí fór mótstøðan ímóti tí at gerast stór. Harumframt fór tað at verða mestsum ógjørligt at krevja skatt inn upp á ull og kjøt. Pløyen helt, at frægasti mátin var at skatta hvørja mørk í jørð, men ráðið helt ikki, at tað var skilagott, tí merkurnar vóru so ymiskar í virði, og tí gjørdist ein skattur á tær sera órættvísur. Skuldi ein slíkur skattur virka, skuldi virðið á jørðini metast av nýggjum frammanundan.

Innanríkisráðið sá tí fyri sær, at inntøkur heldur kundu fáast við at krevja lastaavgjald frá skipum, og í øðrum lagi kundu avgjøld krevjast av rúsdrekka. Í aðrar mátar helt ráðið, at vøruflutningur millum Danmark, Føroyar og Ísland skuldi roknast sum innanríkis flutningur og tí koma undir tær lógir, sum vóru galdandi fyri slíkan vøruflutning. Fyri at krevja avgjøldini inn helt ráðið, at tað rættasta var at gera Havnina, Klaksvík, Vestmanna og Tvøroyri til eftirlitsstøð, so allur innflutningur skuldi koma til tær havnirnar, og síðani kundi vøran flytast kring landið. Innanríkisráðið legði áherðslu á, at fiskiskip og skip, sum sigldu millum oyggjarnar, ikki skuldu gjalda nakað lastaavgjald, tí tað fór at forða fyri menningini av fiskivinnuni, sum fór at fáa so stóran týdning í framtíðini. Samanlagt roknaði ráðið við, at 4800 ríkisdálar fingust í avgjøldum, men tað varð mett at fara at kosta 3000 ríkisdálar at løna teimum fólkum, sum skuldu syrgja fyri at heinta avgjøldini inn og forða fyri misbrúki.

Innanríkisráðið vísti á, at meginparturin av teimum avgjøldum, sum longu vóru á jørðini, vórðu goldin in natura, og handilin tók sær av at umskapa vørurnar til pening. Ein slík skipan fór ikki at bera til í framtíðini, tí nú skuldu avgjøldini gjaldast í peningi. Til at finna út av, hvussu nógvur peningur skuldi gjaldast, átti ein skipan við kapiteltaksti, sum var ásettur eftir prísinum árið fyri, at setast í gildi. Innanríkisráðið helt, at tað var rættast, at Fíggjarmálaráðið átók sær uppgávuna at standa fyri at krevja inn øll avgjøld, bæði tey nýggju og tey,



*Wilhelm Carl Eppingen Sponneck, fíggjarmálaráðharri, boðaði Innanríkisráðnum frá, at so leingi sum serskipanir vóru galdandi fyri Føroyar, so hevði Fíggjarmálaráðið ongan áhuga at fara inn í føroysk mál. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

sum handilin vanliga hevði tikið sær av. Harumframt vildi Innanríkisráðið hava at vita, hvussu best var at skipa almennar grunnar og annað, sum handilin higartil hevði umsitið. Tí var tilmæli hjá ráðnum, at Fíggjarmálaráðið legði fram eina lóg um skipaferðslu og avgjøld, meðan Innanríkisráðið sjálvt legði fram eina lóg um „Handelsnæring paa Færøerne“. Ráðið vildi helst hava, at hesar lógir vórðu lagdar fram á ríkisdagstingsetuni fyri 1852[321].

Fíggjarmálaráðið svaraði ein góðan mánað seinni, at tað helt ikki, at føroysk mál skuldu býtast sundur millum ymisk málaráð, fyrr enn Føroyar gjørdust fullur partur av „det danske Statssamfund“. Tá kundi Fíggjarmálaráðið átaka sær at umsita málini, eins og tað gjørdi við øll onnur mál, men so leingi, sum serskipanir skuldu galda fyri Føroyar, var eingin áhugi í at fara inn í føroysk mál. Harumframt helt Fíggjarmálaráðið, at tað var sera ivasamt, um tað var skilagott at brúka 3000 ríkisdálar til at krevja 4800 ríkisdálar inn. Ráðið helt, at tað var nógv lættari, um ein inntøkuskattaskipan varð innførd[322].

### *15.3.2.1 Dahlerup amtmaður sigur sína hugsan*

Í brævinum til amtmannin greiddi Innanríkisráðið frá, at Pløyen hevði givið

321 TSS. Løgtingið. Lagtingssager 1852-73. Brævið frá Innanríkisráðnum til Fíggjarmálaráðið dagfest 30. apríl 1851 liggur í avriti í løgtingsmálum fyri 1853.

322 TSS. Løgtingið. Lagtingssager 1852-73. Brævið frá Fíggjarmálaráðnum til Innanríkisráðnum dagfest 2. juni 1851, undirskrivað av Sponneck fíggjarmálaráðharra, liggur í avriti í løgtingsmálum fyri 1853.

*Nýggi amtmaðurin Carl Emil Dahlerup skrivaði Innanríkisráðnum langt álit um ymisk atlit, sum skuldu takast, nú tað var í umbúna at avtaka Einahandilin. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



teimum fleiri viðmerkingar og ískoyti í sínari tíð, men enn hevði nýggi amtmaðurin Dahlerup ikki fingið høvi at greiða frá sínum sjónarmiðum. Hann fekk tí somu spurningar sum Fíggjarmálaráðið, men hann varð eisini spurdur um ymisk viðurskifti, sum skuldu umskipast, tá ið Einahandilin varð avtikin. At hetta var eitt mál, sum lá Rosenørn á hjartað, sást beint eftir, at Fíggjarmálaráðið hevði svarað, tí stutt eftir sendi hann amtmanninum svarið frá fíggjarmálaráðnum[323].

Dahlerup amtmaður svaraði endiliga 30. oktober 1851, men tá var Rosenørn ikki longur innanríkisráðharri, tí hann fór frá, tá ið stjórnin varð umskipað í juli. Í hansara stað kom fyrrverandi amtmaðurin í Føroyum F.F. Tillisch, sum upprunaliga setti gongd í allan spurningin um eina komandi fiskivinnu.

Dahlerup var týðiliga liberalur av lyndi, tí hann óttaðist als ikki fyri, at vørumangul fór at kom í, tá ið Einahandilin varð avtikin. Tvørturímóti væntaði hann, at landið fór at flóta yvir í vørum. Tí var hann heldur ikki samdur í, at Einahandilin skuldi halda fram í einum stað fyrstu tíðina. Hann roknaði ikki við, at tað fór at hjálpa føroyingum at venja seg betur við handilslívið, og hann helt, at tað fór at gerast dýrt hjá statinum, tí hinir handilsmenninir fóru sjálvandi at seta prísin soleiðis, at teir fóru við øllum handlinum, og tá ið hetta síðsta handilsstaðið so skuldi seljast, fór áhugin at keypa at gerast minni, tí handilsfyritøkurnar vóru tá longu grundlagdar.

323 TSS. Løgtingið. Lagtingssager 1852-73. Brøv frá Innanríkisráðnum til amtmannin dagfest 30. apríl 1851 og 10. juni 1851 liggja í avriti í løgtingsmálum fyri 1853.

Amtmaðurin var samdur við málaráðini um, at brúk var fyri onkrari skipan at skatta føroyingar, tá ið inntøkan av handlinum hvarv. Hann helt, at tað besta hevði verið, um talan var um beinleiðis skatt, men hann helt ikki, at føroyingar høvdu havt nakað ímóti tí, tí teir vistu, at okkurt mátti koma í staðin fyri handilsinntøkurnar. Høvuðsinntøkukeldan í Føroyum var ull og seyðakjøt, men amtmaðurin ásannaði, at tað var rætt, at tað var ógjørligt at krevja skatt av tí, eins og tað var ógjørligt at krevja skatt av markatalinum, tí jørðin var so øgiliga sundurbýtt, og jarðarteigar skiftu í heilum hendur. Tí var eingin annar møguleiki enn at seta í verk eina óbeinleiðis skattaskipan.

Av tí, at tað fór at vera alt ov kostnaðarmikið at skipa ein tollstovn, sum var líkur tí danska, í Føroyum, ráddi um, at avgjaldskipanin var so einføld, sum til bar, og tí tók hann undir við at skatta lastarúmið á skipum, sum sigldu upp á Føroyar. Amtmaðurin hevði tó møguleikarnar hjá einari komandi fiskivinnu í huganum, og tí mælti hann til, at ansað varð eftir, at avgjøldini á sponsk skip, sum møguliga fóru at koma til Føroya eftir fiski, ikki gjørdust ov stór. Eitt uppskot var, at avgjald fyri slíkt virksemi varð ásett eftir nýtta lastarúminum og ikki tí samlaða. Við tíðini fór eitt lágt avgjald helst at geva meira av sær, so hvørt sum framleiðslan øktist.

Fíggjarmálaráðið hevði sett spurnartekin við, um tað var rætt, at føroyskar vørur kundu flytast inn til Danmarkar tollfrítt, men tað helt amtmaðurin var umráðandi fyri at varðveita handilssambandið millum Danmark og Føroyar, tí komu avgjøld at liggja á teirri ferðsluni, so var so skjótt, at bretar fóru at yvirtaka allan handilin.

Amtmaðurin tók fult og heilt undir við, at tey fýra støðini, har Einahandlin longu var, vórðu gjørd til føst handilsstøð, og at sýslumaðurin búsetti seg í teimum húsunum, sum handilsforvaltararnir nú búðu í. Á hesum handilsstøðum skuldi vera frítt hjá øllum at handla, og hann helt eisini, at onkur átti at fingið handilsloyvi í Vágum og á Sandi, tí tær oyggjarnar lógu eitt sindur illa fyri í mun til føstu handilsstøðini. Viðvíkjandi sonevnda spekulanthandlinum var hann samdur við ráðnum um, at spekulanthandil skuldi bannast, og hann helt ikki, at tørvur var á at loyva honum í sambandi við neyðsynjarvørur.

Tá ið handilin fór at gevast, fóru fleiri uppgávur at liggja eftir. Ein teirra var at ansa eftir allari útgerð í havnunum. Tað hevði verið ein natúrlig uppgáva hjá kommunum at átikið sær, men enn var eingin kommunuskipan í Føroyum, men herdeildin á Skansanum kundi átaka sær hesa uppgávuna í fyrstu syftu. Ein útskifting av jørð var eisini neyðug, um møguleiki skuldi vera hjá handilsmonnum at keypa sær pláss at byggja á í handilsstøðunum. Í Havn var einki pláss eftir, og í hinum støðunum lá nógv í felag, og tí var torført at keypa grundstykki.

Einahandilin syrgdi fyri at vraka vánaligar vørur, og tað gjørdi, at føroysku vørurnar høvdu gott orð á sær uttanlands, men tá ið handilin varð avtikin, var vandi fyri, at teir privatu handlarnir fóru at slaka á hesum økinum, tí føroyingar

sjálvir hugsaðu mestsum bara í mongd og løgdu minni í góðsku. Tí hevði Pløyen hildið, at tað var umráðandi, at ein vrakingarstovnur varð settur á stovn, sum kundi tryggja, at vánaligar vørur, sum kundu oyðileggja góða ummælið, ikki vórðu seldar av landinum. Hesum var Dahlerup samdur í, men hann helt ikki, at ein slík uppgáva skuldi kosta handilsmonnum stórvegis, og tí skeyt hann upp, at uppgávan var løgd á teir, sum longu frammanundan skuldu taka sær av tollinnkrevjing.

Amtmaðurin tók undir við at gera eina kapiteltakstskipan, sum gjørdi, at til bar at fara frá eini skipan, har avgjøld vóru goldin í vørum, til eina, har peningur skuldi gjaldast. Viðvíkjandi peningi vísti hann eisini á, at Einahandilin hevði umsitið allar almennar kassar, og í handilinum komu rentur eisini upp á peningin. Millum almennu kassarnar nevndi amtmaðurin Overformynderiet, sum átti 13.000 ríkisdálar, kirkjurnar, Sparikassan, Økonomisk fond og Fondet for forulykkedes efterladte. Hesin peningurin mátti í fyrstu syftu fara í statskassan.

Amtmaðurin gjørdi sær eisini nakrar hugsanir um møguligt dampskipssamband við umheimin, hvussu ein loðs- og tulkatænasta kundi skipast, og at enda gjørdi amtmaðurin sær nógvar hugsanir um, hvussu eitt sløkkilið kundi skipast serliga í Havn. Kongligi handilin hevði nakrar pumpur, men tær vóru í ringum standi og høvdu ikki verið royndar í 12 ár, og harumframt var eingin, sum hevði royndir í at brúka tær. Tá ið handilin var avtikin, og býurin misti hesar pumpurnar, fór býurin sjálvur ikki at megna at fáa til vega nýggjar pumpur, og tí vildi amtmaðurin hava, at býurin fekk pumpurnar frá Einahandlinum, tá ið hann varð avtikin. Hann tók eisini undir við lógaruppskotinum, sum ráðið hevði sent honum um skipan av einum sløkkiliði í Havn.

Síðsta viðmerkingin var, at Dahlerup á amtsskrivstovuni einki skjal hevði funnið um viðgerðina av handilsmálinum, hvørki tað, sum Pløyen hevði skrivað, ella tað, sum myndugleikarnir í Danmark høvdu sent til amtmannin. Tí fekk hann ikki gjørt fleiri viðmerkingar, men hann ivaðist ikki í, at málið hevði verið væl og virðiliga viðgjørt av sínum undanmanni[324].

### *15.3.2.2 Bang orðar lógaruppskot við fleiri avmarkingum*

F.F. Tillisch náddi ikki at gera meira við spurningin um fríhandilin í Føroyum, eftir at amtmaðurin hevði sent sínar viðmerkingar, tí hann fór frá sum innanríkisráðharri, tá ið stjórnarskifti var aftur í januar 1852. Tá tók C.A. Bluhme við sum forsætisráðharri, og í hesi stjórnini var P.G. Bang innanríkisráðharri. Bang hevði verið í Rentukamarinum síðani 1845, og hann var eisini kongligur umboðsmaður á Stættatingi, tá ið málið um Einahandilin var fyri har í 1846. Nú fall tað so í hansara lut sum innanríkisráðharri at gera eitt lógaruppskot um handilin í Føroyum.

---

324 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 211. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 30. oktober 1851.



*Meðan avtøkan av Einahandlinum var til viðgerðar, hildu arbeiðsfólk í Havn fram við at virka fisk á Viðarnesi. Pakkhúsið hjá Jacobæusi sæst uttast til vinstru. (Mynd H.N. Jacobsens Bókahandil)*

Í grundgevingunum fyri lógaruppskotinum varð sagt, at ein leysgeving av føroyska handlinum „maa betragtes som en Nødvendighed“. Uppgávan hjá ráðnum var tí at gera eina lóg, sum var gagnlig fyri føroyingar, og finna eina hóskandi avgjaldsskipan, sum kundi fíggja tær útreiðslur, sum staturin hevði av Føroyum. Uppskotsstillararnir vóru samdir í, at rætti mátin var at leggja avgjald á skip eftir stødd, men teir mæltu eisini til, at avgjald varð lagt á loyvi at selja brennivín, og so skuldi eisini gjaldast fyri handilsloyvi. Á tann hátt kundu Føroyar við tíðini koma at geva sítt íkast til „de almindelige Statsfornødenheder.“

Grundgevingarnar vóru sostatt tær somu, sum høvdu verið frammi fyrr, men í sjálvum lógargreinunum vóru ásettar fleiri avmarkingar í fría handlinum, og hesar ásetingar viku rættiliga nógv frá meginregluni í nevndarálitinum frá 1842 um, at handilin skuldi vera fríur hjá øllum at reka, og at hann skuldi kunna rekast allastaðni í landinum. Innanríkisráðið fór aftur til, at tað bara var í fýra handilsstøðum, at handil kundi rekast, og at tað bara vóru danskir ríkisborgarar, sum kundu fáa handilsloyvi. Grundgevingin fyri hesari broyting var, at avmarkaðu handilsstøðini tryggjaðu, at gongd kom í veruligan handil, og tað gav ein tryggleika fyri, at vørumangul ikki kom í. Einki sæst í álitinum til nakra grundgeving fyri at avmarka møguleikarnar at fáa handilsloyvi til danskar ríkisborgarar[325]. Tað er tó púra greitt, at Innanríkismálaráðið royndi at avmarka handilsfrælsið í mun til tað, sum hevði verið frammi frammanundan. Hví Innanríkisráðið valdi at gera eitt uppskot, har so stórar avmarkingar vóru í fría handlinum, er ógreitt, men

325 „Udkast til Lov om Ophævelse af det Kongelige Handelsmonopol paa Færøerne.“ Hetta er prentað álit, sum í hesum førinum er funnið í savninum hjá Den adm. Direktion for den Kongelige Fær. Handel á Ríkisskjalasavninum.

*Tá ið spurningurin um takstirnar á vørum í Føroyum var til viðgerðar í Statsráðnum í 1852, vardi Fríðrikur 7. kongur føroyingar og helt, at so leingi føroyingar ikki høvdu fingið fríhandil, høvdu teir rætt til at fáa rug til ein prís, sum teir megnaðu at gjalda. Ráðharrarnir tóku kongsins hugsan til eftirtektar, so heilt uttan vald var kongur ikki, sjálvt um einaveldið var avtikið. (Mynd: wikicommons)*



eitt boð kundi verið, at Bang framvegis var ávirkaður av teimum hugsanum, sum vóru í Rentukamarinum, áðrenn kollveltingina í 1848.

Meðan fríhandilin var til viðgerðar í Innanríkisráðnum, skuldi stjórnin góðkenna uppskotið um handilstakst, sum Handilsstjórnin kom við á hvørjum ári. Í 1852 legði innanríkisráðharrin handilstakstin fyri árið fyri Statsráðið. Handilsstjórnin hevði skotið upp at hækka prísin á bygg og ertrum eitt sindur, og tað elvdi til kjak í ráðnum, tí fíggjarmálaráðharrin Sponneck vildi hava prísin at líkjast meira teimum marknaðarprísum, sum vóru galdandi, tí annars gekk tað bara út yvir statskassan. Innanríkisráðharrin royndi at verja sína støðu, og sjálvur kongur royndi at verja føroyingar. Hann segði, at so leingi eingin fríhandil var, høvdu føroyingar rætt til at fá rug til ein prís, sum teir megnaðu at gjalda, og hann kundi heldur ikki at nakran hátt taka undir við, at ertrur vórðu sendar til Føroya heldur enn rug. Steen A. Bille var skjótur at taka undir við kongi, og tá ið Sponneck fíggjarmálaráðharri eisini bakkaði við at siga, at hann bara hevði havt fíggjarlig viðurskifti í huga, tók Statsráðið undir við tilmælinum frá Handilsstjórnini (Jørgensen 1960: 37). Einaveldið var avtikið, men enn hevði kongur ávirkan á í hvussu er prísirnar í Føroyum.

### 15.3.3 Løgtingið liberaliserar uppskotið hjá Innanríkisráðnum í 1853

Áðrenn lógaruppskotið kom aftur úr Innanríkisráðnum, var danska stjórnin enn eina ferð skift út, og 21. apríl 1853 tók kendi løgfrøðingurin A.S. Ørsted við sum forsætisráðharri, og hann var samstundis eisini innanríkisráðharri. Tað var



*Andreas Sandøe Ørsted var ikki fegin um uppskotið um avtøku av Einahandlinum í Føroyum, sum hann fann, tá ið hann tók við sum forsætis- og innanríkismálaráðharri í apríl 1853. Hann valdi kortini at senda Løgtinginum uppskotið til viðgerðar. (Mynd: wikicommons)*

tí hann, sum fekk til uppgávu at senda Løgtinginum uppskotið, og tað gjørdi hann 11. juli 1853. Í brævinum til løgtingsformannin er týðiligt, at hann ikki var so fegin um lógaruppskotið. Hann greiddi frá, at tá ið hann tók við sum innanríkisráðharri hevði hann funnið eitt lógaruppskot, sum undanfarni ráðharrin hevði gjørt. Uppskotið hevði tá verið til viðmerkingar í fíggjarmálaráðnum og hjá Handilsstjórnini, men sjálvur ivaðist Ørsted stórliga í fleiri av ásetingunum í lógini, og tí ivaðist hann í, um tað var rætt at leggja uppskotið fram sum eitt av uppskotum kongs. Hinvegin hevði hann eisini fleiri ferðir hoyrt ynski um, at málið varð framt sum skjótast, og tí hevði hann avgjørt at senda Løgtinginum uppskotið kortini. Løgtingið kundi so gera viðmerkingar til tað, og tær viðmerkingarnar kundi stjórnin so nýta, tá ið hon orðaði endaliga uppskotið[326].

Amtmaðurin gjørdi, sum innanríkisráðharrin hevði biðið um, og mánadagin 1. august boðaði hann Løgtinginum frá, at eitt mál á skránni dagin eftir var, „hvordan der skal forholdes med hensyn til Behandlingen af Udkast til Lov om Ophævelse af det kongl. Handelsmonopol paa Færøerne.“ Løgtingið avgjørdi, at ein fimmmannanevnd skuldi veljast at viðgera uppskotið. Síðani var ein steðgur í tveir tímar, og eftir hann valdi tingið nevndina. Í nevndina komu Jørgensen

326 TSS. Løgtingið. Lagtingssager 1852-73. Brævið frá Innanríkisráðnum dagfest 11. juli 1853, merkt F.A.J. 857, liggur í løgtingsmálum fyri 1853.

*Winther sýslumaður á Sandi var ein av fimm limum í løgtingsnevndini, sum í 1853 skuldi viðgera uppskotið hjá Innanríkisráðnum um avtøku av Einahandlinum. (Mynd: Tjóðsavnið 8966F11)*



próstur, Winther sýslumaður, Djurhuus prestur, Müller sýslumaður og P.H. Sivertsen skipari[327].

### *15.3.3.1 Nevndarálitið hjá Løgtinginum*

Nevndin ásannaði, at uppgávan var at seta frían handil í verk, so at hann gjørdist til so stórt gagn fyri føroyingar, sum til bar, og at finna eina avgjaldsskipan, so statskassin fekk tann peningin innaftur, sum hann misti av avtøkuni av Einahandlinum. Nevndin tók undir við stjórnini í, at inntøkurnar skuldu koma frá avgjaldi upp á lastarúm á skipum, frá avgjøldum upp á brennivín og frá gjaldi fyri at fáa handilsloyvi. Teir fimm nevndarlimirnir tóku undir við øllum teimum grundgevingunum, sum millum ár og dag vóru frambornar um, hvussu Einahandilin kundi avtakast, og hví tað var neyðugt at innføra frían handil ikki bara fyri danskar statsborgarar, men fyri borgarar úr øllum heiminum.

Innanríkisráðið hevði viðmerkt, at tað var eitt sindur ivasamt um tað, sum stóð í lógaruppskotinum um, at handil bara kundi vera í teimum fýra støðunum, har Einahandilin var frammanundan, og tí var tað ikki torført hjá løgtingsnevndini at siga, at hon upp á tað harðasta frámælti at seta slíka avmarking í fría handilin.

327 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings-Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt d. 22. August 1855. s. 53.



*Løgtingsnevndin skrivaði 24. august 1853 drúgt álit um lógaruppskotið um avtøkuna av Einahandlinum. Nevndin vildi hava eina munandi frælsari lóg, enn gamli innanríkisráðharrin Bang hevði lagt upp til.*

Við at avmarka handilin til fýra støð fór ongin kapping at koma í millum teir privatu, og so vóru føroyingar „givne til Pris for private Monopolisters Udsugelser og Undertykkelser“. Handilin fór at eita fríhandil, men fór at gerast eitt keypmansmonopol, og í so máta var nógv betri at varðveita Einahandilin. Nevndin helt, at „Færingerne have en naturlig Ret til at faae en fuldstændig fri Handel, og ingen Indskrænkninger bør gjøres, uden forsaavidt Samfundsvellet i Almindelighed eller Beboernes Vel maatte fordre det.“

Í álitinum sæst týðiliga, at tað vóru ringu royndirnar, sum íslendingar høvdu av einum avmarkaðum fríhandli, sum fekk nevndina at tala at, og sjálvt um íslendska Altingið fleiri ferðir hevði heitt á stjórnina um at avtaka avmarkingarnar, so hevði stjórnin einki gjørt við tað, tí hon vildi ikki skaða teir, sum høvdu bygt sítt vinnuvirksemi upp á galdandi lóg. Tí ávaraði Løgtingið ímóti at lata nøkur slík

serrættindi fáa fótafesti í Føroyum og heldur loyva fríum handli beinanvegin. Tí helt nevndin eisini, at ein og hvør, sum búði í Føroyum, skuldi hava rætt til at fáa handilsloyvi, og hesin rættur átti ikki at verið avmarkaður til ávís øki. Meirilutin í nevndini helt eisini, at øll skip skuldu kunna selja vørur sínar til tann fyrsta og besta keyparan, og tey skuldu eisini hava loyvi til at keypa vørur frá føroyingum.

Sostatt var løgtingsnevndin nógv liberalari, enn Innanríkisráðið hevði verið, og við hesum grundreglunum fór hon undir at gera viðmerkingar til einstøku lógargreinirnar. Stóru spurningarnir í viðgerðini hjá nevndini vóru spurningarnir um, hvørt handilin skuldi avmarkast til tey fýra støðini, har Einahandilin frammanundan virkaði, og um spekulanthandil skuldi vera loyvdur. Hesir spurningar vóru viðgjørdir í § 3, 10 og 11.

Løgtingsnevndin var harðliga ímóti at avmarka handilin, tí hon helt m.a., at ein slík áseting fór at gera, at bara vælhavandi handilsfyritøkur kundu byrja virksemi í Føroyum, meðan føroyingar sjálvir ongan møguleika fingu fyri at stovna handilsvirki. Tí fór ein slík avmarking eisini at forða fyri menningini av fiskivinnuni, „hvis Udvidelse maa være af den største Vigtighed.“ Nevndin var samd við kongliga umboðsmannin, sum í 1846 hevði sagt, at tað týdningarmiklasta við fríhandlinum var, at føroyingar fóru at sigla við egnum skipum, og tað var bara tann vegin, fríhandilin kundi gerast ein fyrimunur fyri føroyingar. Tær fýra havnirnar kundu hinvegin gerast til tollstøðir saman við Sandi, Miðvági og Kongshavn. Á tann hátt var eitt tollstað í hvørjari sýslu.

Nevndin vildi eisini hava, at tann spekulanthandilin, sum hevði so stóran týdning fyri Ísland, varð loyvdur í Føroyum, serliga um handilin annars varð avmarkaður til nøkur fá støð, men hesin handil skuldi bara gerast frá skipunum sjálvum. Nevndin helt, at ráðið púra hevði misskilt sína uppgávu her, tí tað, sum umráddi hjá føroyingum, var at fáa só nógvar og góðar møguleikar at keypa og selja vørur, sum til bar. Nevndin helt ikki, at grundgevingin um, at avmarkingin til nakrar fastar handlar fyri at tryggja móti vørumangli, var serliga viðkomandi, tí í fríari kapping fóru handilsmenn skjótt at finna fram til, hvør vørutørvurin var. Tá ið vørutrot onkuntíð hevði verið í Íslandi, so var tað ikki orsakað av fría handlinum, men heldur orsakað av teimum avmarkingunum í fríhandlinum, sum har vóru. Nevndin helt, at um handilin skuldi avmarkast til tey 4 støðini, og spekulanthandil samstundis skuldi bannast, so var betri at halda fram við Einahandlinum.

Streymoyar sýslumaður H.C. Müller var ikki heilt samdur við hinar nevndarlimirnar í hesum spurninginum, tí hann helt, at ein ótálmaður spekulanthandil fór at hava trupulleikar við sær. Hann óttaðist serliga fyri brennivínssølu og fyri, hvussu slíkir handilsmenn fóru at uppføra seg á støðum, sum vóru langt burtur frá nøkrum myndugleikum. Tí vildi hann hava, at spekulanthandil varð avmarkaður til føstu handilsstøðini[328].

328 TSS. Løgtingið. Lagtingssager 1852-73. Skjal nr. 7a í løgtingsmálum fyri árið 1853. Viðmerking frá H.C. Müller dagfest 24. august 1853.



*A. W. Skibsted skeyt upp, at føroyingar í tíðini fram til avtøkuna av Einahandlinum fingu høvi til at royna seg sum handilsmenn. Tað kundu teir gera, um tað varð álagt Einahandlinum at taka alla føroyska framleiðslu við skipum sínum sum sendingsgóðs. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

Tá ið nevndin var liðug við sínar viðmerkingar til einstøku greinarnar, endaði hon við at tilmæla eitt uppskot, sum Skibsted konsul hevði sent til nevndina[329]. Skibsted óttaðist fyri, at einki fór at koma burtur úr hesum lógaruppskotinum, tí royndirnar høvdu víst, at sjálvt um nógv tilmæli vóru gjørd um fríhandil, so var hann ikki komin enn. Ein grundgeving hevði verið, at føroyingar vóru ikki búnir til at taka við slíkum frælsi, og í so máta var einki broytt. Tað var fyri at fáa nakað at henda á hesum økinum, at Skibsted skeyt upp, at føroyingar í tíðini fram til avtøkuna av Einahandlinum skuldu fáa loyvi til at senda alla føroyska framleiðslu við handilsins skipum sum sendingsgóðs, og at eitt ávíst pláss varð sett av á skipunum til slíkan flutning. Handilin tók ongan skaða av hesi skipan, men føroyingar fingu høvi at seta seg inn í handilsverðina, og møguliga fingu teir eisini knýtt handilssambond við útheimin, áðrenn fríhandilin kom[330].

### *15.3.3.2 Løgtingið viðger álitið*

Nevndin savnaði sínar viðmerkingar saman í 14 punkt, sum Løgtingið kundi taka støðu til, og 29. august varð álitið lagt fram. Fyrsta viðgerð av málinum var dagin eftir, men tíverri er einki at finna um sjálvt orðaskiftið[331]. 2. september var

329 TSS. Løgtingið. Lagtingssager 1852-73. Skjal nr. 7 í løgtingsmálum fyri 1853. Nevndarálit dagfest 24. august 1853.

330 TSS. Løgtingið. Lagtingssager 1852-73. Skjal nr. 7b í løgtingsmálum fyri 1853. Skriv frá Skibsted konsuli dagfest 22. august 1853.

331 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings-Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt d. 22. August 1855. s. 71.

málið til aðru viðgerð, og tá skuldi Løgtingið atkvøða um tey einstøku tilmælini hjá nevndini. Løgtingið samtykti einmælt at taka undir við øllum tilmælum hjá nevndini, men ein atkvøða var ímóti at loyva spekulatiónshandli í øllum havnum, og ein atkvøddi ímóti uppskotinum hjá Skibsted.

Nøkur broytingaruppskot vóru eisini komin frá Zachariasen sýslumanni í Vágum til viðgerðina um m.a. at áseta, at Einahandilin skuldi avtakast í seinasta lagi 1. januar 1855, og at spekulatiónshandil kundi loyvast frá 1. januar 1854. Hesi bæði uppskotini fullu. Eitt annað broytingaruppskot frá H.D. Matras, P.H. Sivertsen og D.P. Christiansen um at tey skip, sum komu til Føroya fyri at lossa ull, sum var ætlað til víðari framleiðslu í Føroyum, skuldu sleppa undan at lata lastaavgjald, varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 2 ímóti. Eitt annað broytingaruppskot frá Hans Djurhuus, Guttorm Absalonsen og H.D. Matras um at bara tey, sum frá amtinum høvdu fingið loyvi til at handla við brennivíni, fingu loyvi til at handla við víni, varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti[332].

5. september skrivaðu formaðurin í nevndini, O.F.C. Jørgensen próstur, og H.D. Matras, løgtingsskrivari, bræv til Innanríkisráðið, har teir greiddu frá støðu tingsins til lógaruppskotið, og teir endaðu brævið við at siga, at løgtingið inniliga heitti á ráðið um, at lógin „ikke maa blive bygget paa de Hovedgrundsætninger, som indeholdes i det til Lagthinget til Betænkning forelagde Udkast, men at den forestaaende Handelslov maa vorde bygget paa saadanne i Virkeligheden frie Grundsætninger, som de Lagthinget i denne sin Betænkning har udtalt."[333] Hetta brævið varð lagt fram 7. september og lisið upp og samtykt dagin eftir[334].

Tá ið Innanríkisráðið fekk álitið frá Løgtinginum og sá, at tað í so stóran mun víkti frá upprunaliga uppskotinum, helt ráðið, at tað var frægast at fáa teir menn, sum vóru settir at viðgera spurningin um handilsviðurskiftini í Íslandi, til eisini at viðgera henda spurningin. Nevndin fekk tí 3. november eina áheitan um at gera tað, og samstundis valdi ráðið tveir nýggjar limir í nevndina, sum høvdu serligt innlit í føroysk viðurskifti. Teir vóru Bentzen, sum var limur í stjórnini fyri grønlendska og føroyska handilin, og Jørgensen próstur, sum var landstingsmaður fyri Føroyar („Rigsdagstidende" 1854a, kol. 59, Anhang A)

### 15.3.4 Ríkisdagurin viðger sítt egna uppskot 1853-54

Tá ið tað frættist, at innanríkisráðharrin ætlaði at geva nevndini, sum arbeiddi við íslendska fríhandlinum, málið og harvið útseta avgerðina enn longur, avgjørdi føroyski fólkatingsmaðurin Niels Winther sjálvur at leggja málið fyri Fólkatingið. Tað varð gjørt 25. oktober 1853. Í framløgu síni segði hann, at hann sjálvur hevði sett lógaruppskotið saman út frá uppskotinum hjá innanríkisráðharranum

332 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings-Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt d. 22. August 1855. s. 76-78.

333 TSS. Løgtingið. Lagtingssager 1852-73. Skjal nr. 7f í løgtingsmálum fyri 1853. Bræv frá Løgtinginum til Innanríkisráðið dagfest 5. september 1853.

334 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings-Protokol I. Begyndt d. 299. Juli 1852 og endt d. 22. August 1855. s. 82



*Tá ið Innanríkisráðið valdi at leggja uppskotið fyri eina serfrøðinganevnd heldur enn at lata Fólkatinginum tað til viðgerðar, valdi Niels Winther sjálvur at leggja fram eitt uppskot, sum hann hevði sett saman av upprunauppskotinum hjá Bang innanríkisráðharra og viðmerkingunum hjá Løgtinginum.*

og viðmerkingunum hjá Løgtinginum, og sjálvur hevði hann gjørt onkrar smáar broytingar. Niels Winther helt, at hann undir vanligum umstøðum als ikki hevði hættað sær at lagt eitt lógaruppskot fram, men hetta málið var eftirhondini so væl lýst og viðgjørt, at hann í hesum førinum tordi at taka hetta stig. Hann var vísur í, at tað, at málið endaði í enn einari stórari nevnd, fór at seinka málinum, og tí vildi hann hava tingið at „tage Sagen i sin Haand." (Rigsdagen 1853, kol. 442–443).

Tá ið Fólkatingið nakrar dagar seinni viðgjørdi spurningin, um tingið skuldi taka lógaruppskotið hjá Niels Winther til viðgerðar, boðaði innanríkisráðharrin frá, at ráðið ætlaði at leggja fram eitt líknandi lógaruppskot, men hann dugdi ikki at siga, nær tað fór at verða klárt (Rigsdagen 1853, kol. 605). Alfred Hage, sum var kornhandilsmaður, mælti til, at Fólkatingið tók málið upp. Hann greiddi frá grundgevingunum, sum høvdu verið frammi fyrr, og helt tað vera „høist ubilligt imod Færingerne" ikki at viðgera málið. Innanríkisráðharrin svaraði, at hann einki ynski hevði um at forða fyri at viðgera málið, tí úrslitið hjá stjórnini fór ikki at verða ávirkað av, um tingið tók málið upp nú ella ikki. Tá ið hann upprunaliga var atfinningarsamur um uppskotið hjá undanfarna innanríkisráðharranum, so var tað av somu orsøkum, sum Løgtingið hevði víst á (Rigsdagen 1853, kol. 608).

Niels Winther segði, at hann nógv heldur vildi havt, at stjórnin var komin við málinum, men hann vónaði, at stjórnin fór at kunna arbeiða víðari við hansara uppskoti, so at tær broytingar, sum stjórnin vildi hava, kundu gerast

undir viðgerðini í Ríkisdegnum (Rigsdagen 1853, kol. 608). D.G. Monrad helt, at stjórnin og tingið í størri mun áttu at virða arbeiðið hjá hvørjum øðrum, men Frederik Barfod helt, at tá ið innanríkisráðharrin hevði sagt, at hann ikki vildi leggja málið fram, fyrr enn hann hevði fingið ráðført seg við menn, hvørs hugsanir hann hevði álit á, so kundi tað bara eggja Fólkatinginum enn meira til at taka lógaruppskotið til viðgerðar (Rigsdagen 1853, kol. 609).

Rosenørn, sum var innanríkisráðharri, tá ið Fólkatingið samtykti, at ein lóg skuldi gerast um avtøku av Einahandlinum, vísti á, at tá ið spurningurin um føroyska umboðan á Ríkisdegnum var til viðgerðar, varð tað av einum, sum sat í „Kongens Raad", og sum hevði havt nógv samband við Føroyar, sagt, at ein av fremstu fyrimununum við føroysku umboðanini fór at verða, at tað fór at ganga skjótari at avtaka Einahandilin. Hann helt tí ikki, at tað var at ganga ráðharranum ov nær at taka málið til viðgerðar, tí ein av størstu fyrimununum við „den lovgivende Forbindelse" við Føroyar var júst tann, at føroyska umboðið skuldi kunna bera fram tað, sum rørdist í Føroyum (Rigsdagen 1853, kol. 610).

Innanríkisráðharrin endaði orðaskiftið við at siga, at hann einki hevði ímóti málinum. Tvørturímóti vildi hann persónliga hava tað framt, og hann óttaðist eisini fyri, at tað fór at hála tað út, um tingið setti seg at bíða eftir máláráðnum. Tí segði hann seg vilja, at tingið tók málið upp, og tá hoyrdust „Hør!" róp í salinum. Tá ið innanríkisráðharrin hevði hesa støðu, kundi tingformaðurin bara siga, at hann helt málið vera greitt, og tá ið eingin mótmælti, varð tað tikið til viðgerðar (Rigsdagen 1853, kol. 612).

### *15.3.4.1 Viðgerðin í Fólkatinginum*

Málið um avtøkuna av Einahandilin var til fyrstu viðgerð í Fólkatinginum 5. november 1853. Niels Winther byrjaði viðgerðina við einari langari røðu, har hann gjøgnumgekk tað, sum higartil var hent í málinum, og greiddi frá støðu Løgtingsins (Rigsdagen, 1853, col. 874–883). Innanríkisráðharrin endurtók sína støðu um, at hann ikki føldi, at hann var til reiðar at luttaka í orðaskiftinum, fyrr enn teir sakkønu, sum vóru settir at gera álit í málinum, vóru lidnir við sítt arbeiði. Hann boðaði kortini frá, at hann ætlaði sær at leggja uppskotið frá teimum sakkønu fyri Landstingið, tá ið málið var klárt at leggja fyri Ríkisdagin. Hann gjørdi eisini púra klárt, at spurningurin als ikki var, um føroyingar skuldu hava fríhandil, bara hvussu tað skuldi gerast (Rigsdagen 1853, kol. 885). Innanríkisráðharrin helt, at nógvar av viðmerkingunum hjá Løgtinginum høvdu rættað upp á viðurskifti, sum hann sjálvur helt haltaðu í upprunaliga uppskotinum frá undanfarna innanríkisráðharranum. Hinvegin helt hann eisini, at tað var óheppið, at Løgtingið hevði ásett so strangar avmarkingar í handli við víni og brennivíni. Tí viðvíkjandi væntaði hann í hvussu er onkrar broytingar í uppskotinum, sum hann fór at leggja fram, tá ið tað var klárt (Rigsdagen 1853, kol. 887).

Prinsippielli spurningurin um, hvørt tingið kundi loyva sær at viðgera uppskot, sum onkur tinglimur sjálvur hevði lagt fram, ella um tingið bara var „til for at



*A.F. Tscherning helt lítið um, at málið um føroyska handilin var koyrt í eina serfrøðinganevnd, tí serfrøðin var ofta blandað við fordómum. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

thinglæse Regjeringens Forslag“ (Rigsdagen 1853, kol. 799), sum Hage orðaði tað, fylti nógv í kjakinum, og hin stóri spurningurin var, um tað var rætt av ráðharranum at bíða eftir hugsanini hjá teimum serkønu. Fleiri hildu, at tinglimirnir vóru ivaleysa serkønir, og aðrir hildu, at Løgtingið í slíkum føroyskum málum var tað mesta serkøna av øllum, og at tað júst var endamálið við at seta Løgtingið á stovn árið fyri (Rigsdagen 1853, kol. 897). Tscherning orðaði trupulleikan við teimum serkønu eina best, tá ið hann helt, at tað júst vóru teir serkønu, sum vóru største forðingin fyri, at broytingar hendu. Hann segði:

> Vi have forhandlet de færøske Love med de Sagkyndige, og vi have viist de meest Sagkyndige, at de ikke vare sagkyndige, netop fordi de vare hildede i deres egen Sagkundskab. I al Sagkundskab er der jævnlig blandet Fordom, og den kommer ofte til at beherske selv den simpleste sunde Forstand. Jeg troer, at Ministeren vil gjøre sig og Staten en overordentlig stor Tjeneste ved for Fremtiden ikke at søge sagkyndige Mænd andetsteds end i et af Thingene. (Rigsdagen 1853, kol. 894)

Seinni í røðu síni segði Tscherning, at tað fór at verða nógv lættari hjá einum føroyingi at vera amtmaður, tí „Deres Forhold ere af en langt simplere Natur, og de blive meget vanskelige at fatte for en Mand, som kommer herfra, medens

*Ditlev Gothard Monrad skrivaði fyrsta uppskotið til eina nýggja grundlóg í 1848, men hann var eisini formaður í fólkatingsnevndini, sum skuldi viðgera uppskotið hjá Niels Winther um fríhandil í Føroyum. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



de ere ligesaa simple at forstaae for en Færinger, som for en Bonde paa Amager at handle med Kaal.“ (Rigsdagen 1853, kol. 896) Tá ið føroyingar fingu sín egna amtmann, skuldu útreiðslurnar eisini gjaldast í Føroyum. Fyri eftirtíðina má hetta tykjast sum eitt ógvuliga víðgongt sjálvstýri, og søguliga gongdin eftir fríhandilin gjørdi eisini, at ein føroyskur amtmaður ongantíð kom upp á tal. Kortini er áhugavert at síggja, at nøkur av teimum viðurskiftunum, sum vórðu nevnd í hesum orðadráttinum, peikaðu beint fram móti tí, sum gjørdust stóru spurningarnir móti endanum á øldini, nevniliga føroysk sjálvstýri og strangari rúsdrekkareglur.

Nógv meira áhugavert kom ikki fram undir fyrstu viðgerð, og viðgerðin endaði við, at tingið einmælt samtykti at koyra málið til 2. viðgerð. Niels Winther skeyt upp at velja eina fimmmannanevnd at viðgera spurningin, og í hana komu D.G. Monrad, sum var formaður, Rosenørn, sum var orðførari, Tscherning, Alfred Hage og Niels Winther, sum var skrivari.

### *15.3.4.2 Fólkatingsnevnd víðgongdari enn Niels Winther*

Nevndin skrivaði undir álit sítt nýggjársaftan 1853, og hon fór nakað væl longri, enn Niels Winther og Løgtingið vóru farin, tí hon vildi hava alt, „hvad der kunde være til nogensomhelst Hinder for Handelens Udvikling“, burtur. Tí mælti hon til at lata vera við at krevja nakað avgjald frá skipum, sum komu til Føroya, annað enn tað, sum longu varð kravt til fátækrakassan. Skuldi nøkur inntøka krevjast

av føroyska handlinum, var tað rættast at leggja eitt lítið avgjald á føroyskar vørur, tá ið tær vóru innfluttar til Danmarkar (Rigsdagen 1853, kol. Anhang B: 358). Nevndin helt, at eitt slíkt avgjald var lættari at umsita og við tíðini fór at geva nógv størri inntøkur. Grundgevingin hjá nevndini fyri tí var, at longu nú var fiskaútflutningurin 10 faldaður í mun til fyrstu árini av øldini (Rigsdagen 1853, kol. Anhang B: 364). Tí orðaði nevndin eitt nýtt lógaruppskot í 9 greinum, og samstundis tók Niels Winther sítt uppskot aftur.

Tá ið málið varð til aðru viðgerð 1. februar 1854, boðaði innanríkisráðharrin A.S. Ørsted frá, at hann fór ikki at taka lut í viðgerðini, tí eitt lógaruppskot frá stjórnini var á veg (Rigsdagen 1853, kol. 4080). Endin varð, at kjakið fyri tað mesta var um, hvørt tað var rætt av stjórnini at nokta at taka lut í viðgerðini av einum uppskoti, sum tingmenn sjálvir vóru komnir við. Niels Winther gramdi seg um, at hann sum skrivari í nevndini ikki hevði fingið atgongd til viðkomandi skjøl, tí nevndin, sum viðgjørdi íslendska og føroyska handilin, hevði tey (Rigsdagen 1853, kol. 4087), og Rosenørn helt tað vera undarligt, at ráðharrin ikki vildi viðgera uppskotið, tá nú nevndin hevði broytt tað, so tað var meira í tráð við hugsanirnar hjá ráðharranum. Hann segði, at nevndin hevði fylgt nevndartilmælinum frá 1842 og tí, sum Stættatingið legði afturat í 1846, og teir høvdu fylgt hugsanunum hjá kongliga umboðsmanninum, Rentukamarinum og Handilsstjórnini, tá uppskotið legði upp til, at handilin skuldi vera fríur fyri øll (Rigsdagen 1853, kol. 4089).

Ein trupulleiki við uppskotinum var, at grein 3 ásetti, at kongur kundi áseta avgjøld á skip, ið komu frá londum, sum ikki javnstillaðu donsk skip við onnur. Hetta dámdi Niels Winther lítið, tí hann vónaði, at fiskivinnan fór at vaksa í stórum, tá ið fríhandilin kom, og ein størri fiskivinna fór eisini at merkja øktur handil millum Spania og Føroyar. Spania var eitt av teimum londunum, har donsk skip skuldu gjalda avgjøld, og tí óttaðist hann fyri, at eitt avgjald á sponsk skip í Føroyum kundi forða menningini av føroyskari fiskivinnu. Tá ið hann kortini hevði avgjørt at taka undir við nevndini í hesari ásetingini, so var tað undir teirri treyt, at stjórnin ikki fór at nýta rætt sín til at leggja avgjøld á sponsk skip (Rigsdagen 1853, kol. 4095–96).

Tá ið atkvøtt varð um tær einstøku lógargreinirnar, vórðu tær allar einmælt samtyktar, og málið fór soleiðis til triðju viðgerð (Rigsdagen 1853, kol. 4100). Nakrar dagar seinni var uppskotið til triðju viðgerð. Tá tók ongin orðið, og málið varð einmælt samtykt við 70 atkvøðum fyri. Formaðurin beindi lógaruppskotið til víðari viðgerð í Landstinginum (Rigsdagen 1853, kol. 4260).

### *15.3.4.3 Próstur steðgar málinum í Landstinginum*

Tá ið Fólkatingið hevði samtykt lógaruppskotið, skuldi tað fyri Landstingið, og 13. februar 1854 tók Landstingið føroyska fríhandilin til viðgerðar. Tingið skuldi fyrst av øllum avgera, um tað vildi viðgera uppskotið, og í teirri viðgerðini tók ein orðadráttur seg upp millum føroyska umboðið, Jørgensen próst, og

Balthazar Christensen, sum hevði sitið í Fólkatingsins fíggjarnevnd í nøkur ár, áðrenn hann varð valdur í Landstingið. Prósturin vildi hava, at ein nevnd varð sett beinanvegin, meðan Christensen heldur vildi, at tingið viðgjørdi og avgreiddi málið. Báðir vóru samdir um, at tað hevði týdning at fáa málið avgreitt, men ikki hvussu tað kundi gerast sum skjótast. Endin varð, at Landstingið við 20 atkvøðum fyri og 14 ímóti samtykti at seta eina nevnd við fimm nevndarlimum (Rigsdagen 1853, kol. Landstinget, 1491).

Um tað var fyri at steðga málinum í Landstinginum, at prósturin mælti til at koyra tað í nevnd, er torført at siga, men endin varð í hvussu er, at lógaruppskotið ongantíð kom til viðgerðar aftur í Ríkisdegnum. Tá ið Landstingið hevði sín síðsta fund 24. mars 1854 greiddi prósturin sum nevndarformaður frá, at nevndin hevði havt nógvar fundir, har teir gjølliga høvdu viðgjørt uppskotið. Nevndin var samd um, at við ávísum broytingum átti uppskotið at verið samtykt, men limirnir vóru ósamdir um broytingarnar, og tí var neyðugt við fleiri upplýsingum á fleiri týðandi økjum. Nevndin hevði eisini roknað við, at stjórnin fór at koma við sínum uppskoti, áðrenn tingsetan var av, men uppskotið kom ongantíð, og tað var ein av orsøkunum til, at nevndin ikki náddi at skriva nakað álit (Rigsdagen 1853, kol. Landstinget, 2418).

### *15.3.4.4 Ísland fær fullan fríhandil*

Samstundis sum Fólkatingið og Landstingið viðgjørdu spurningin um fríhandil í Føroyum, viðgjørdu tingini eisini spurningin um handil og sigling í Íslandi. Eins og í viðgerðini av føroyska málinum, varð eitt uppskot lagt fyri tingið av tingmonnum, men stjórnin vildi ikki viðgera uppskotið, fyrr enn nevndin, sum var sett í september 1853, var liðug við sítt uppskot, og tað elvdi eisini her til stóra misnøgd millum tingmenn, at teir ikki vóru tiknir við í viðgerðina, men bara skuldu bíða til ein onnur nevnd var liðug við sítt arbeiði.

Undir aðru viðgerð av málinum í Fólkatinginum boðaði innanríkisráðharrin frá, at hann eins og í málinum um føroyska handilin ikki fekk viðgjørt henda spurningin enn. Hann væntaði kortini, at stjórnin skjótt fór at kunna leggja sítt lógaruppskot fram, tí málið var so at siga liðugt viðgjørt í ráðnum, og hann hevði sjálvur tikið eina púra greiða støðu (Rigsdagen 1853, kol. 4147).

Lógaruppskotið hjá Innanríkisráðnum var ikki lagt fram, tá ið Fólkatingið hevði triðju viðgerð av tí privata uppskotinum, so tí varð tað lagt fram í Landstinginum, og 14. februar 1854 hevði innanríkisráðharrin eina langa røðu um uppskotið, sum hann segði líktist nógv tí privata, og sum hann vónaði, at tað fór at eydnast at samtykkja hesa tingsetuna (Rigsdagen 1853, kol. Landstingið, 1574-1585). Dagin eftir avgjørdi Landstingið at víkja frá tíðarfreistini og taka bæði málini um fullan fríhandil í Íslandi til viðgerðar. Eitt orðaskifti var, um sama nevnd, sum viðgjørdi føroyska handilin, eisini skuldi viðgera hesi lógaruppskotini, men undirtøka var ikki fyri tí, tí at viðurskiftini vóru ikki tey somu í Føroyum sum í Íslandi (Rigsdagen 1853, kol. Landstingið 1647).

Ein fimmmannanevnd varð sett at viðgera bæði tað privata uppskotið og uppskotið hjá stjórnini, og fyri at tryggja sær, at málið varð framt hesa tingsetuna, valdi nevndin at broyta uppskotið, sum var komið úr Fólkatinginum, so at tað formliga ikki kravdist, at málið fór fyri Fólkatingið aftur. Sostatt viðgjørdi Landstingið uppskotið, sum var komið úr Fólkatinginum, men uppskotið varð í nevnd broytt, so tað eisini samsvaraði við stjórnarinnar uppskot (Rigsdagen 1853, kol. 2049 Landstingið). Innanríkisráðharrin var ímóti at viðgera málini á henda hátt, men tá ið bæði tingformaðurin og aðrir høvdu greitt frá, hví teir hildu, at tað var tað rætta at gera, endaði tað við, at innanríkisráðharrin góðtók mannagongdina. Triðja viðgerð var 11. mars, og tingið samtykti einmælt lógaruppskotið frá nevndini við ávísum broytingum. Tá ið tað var gjørt, boðaði innanríkisráðharrin frá, at tað onga meining gav at viðgera uppskotið frá stjórnini longur, og tí fall tað burtur (Rigsdagen 1853, kol. 2265 Landstingið). Fríðrikur 7. undirskrivaði lógina um handil og sigling í Íslandi 15. apríl 1854.

### 15.3.5 Stjórnaruppskotið verður samtykt

Fáar dagar eftir, at kongur undirskrivaði íslendsku lógini, avgjørdi A.S. Ørsted 29. apríl 1854 at seta ein nýggjan innanríkisráðharra, og tað var aftur Frederik Ferdinand Tillisch, sum tók við uppgávuni. Tí fall tað honum í lut at leggja spurningin um fríhandil í Føroyum fyri Ríkisdagin aftur, tá ið Ríkisdagurin ikki kláraði at avgreiða málið í tingsetuni 1853-54. Tillisch var væl inni í málinum, tí tað var hann, ið sum amtmaður setti gongd á, tá ið hann í 1832 mælti til, at føroyingar fóru undir at fiska við havgangandi deksførum.

Serkøna nevndin, sum hevði viðgjørt íslendska handilin, fekk eisini til uppgávu at gera viðmerkingar til lógaruppskotið um avtøku av Einahandlinum í Føroyum. Nevndin valdi at bíða við hesum partinum, til hon við liðug við at viðgera lógaruppskotið um íslendska handilin, og tí fór hon ikki undir føroyska partin fyrr enn 15. desember 1853. Á fyrsta fundinum greiddi formaðurin teimum báðum nýggju limunum, Bentzen, sum var limur í Handilsstjórnini, og Jørgensen prósti, sum var landstingslimur fyri Føroyar, frá arbeiðinum við íslendsku lógini, og hann legði afturat, at hann helt, at íslendska lógin skuldi nýtast sum fyrimynd fyri ta føroysku. Í fyrstu syftu fóru skjølini í málinum á umferð millum limirnar, og prósturin var tann fyrsti, sum fekk tey at lesa.

Nevndin var klár at fara undir veruliga arbeiðið 13. februar 1854, og skjótt var greitt, at nevndin hugsaði nøkulunda tað sama sum innanríkisráðharrin og bæði Løgtingið og Fólkatingið høvdu gjørt. Hon var samd um, at fleiri lógargreinir, sum avmarkaðu frían handil, skuldu strikast. Millum teirra var ásetingin um at avmarka handilin til fólk, ið vóru búsett í Føroyum, og tær serligu reglurnar fyri sølu av brennivíni. Nevndin vildi hava, at einasta treyt fyri at reka handil var loyvisbræv ella borgaraskapur, eins og tað var í íslendsku lógini. Viðvíkjandi handilsstøðum var nevndin ikki samd, tí Jørgensen próstur og etatsráð Hansen hildu, at loyvt skuldi vera at reka handil alla staðni, og teir vildu eisini hava

frælsari spekulatiónshandil, meðan restin av nevndini vildi halda fast í teimum fýra handilsstøðunum, men at tað við tíðini kundi víðkast til fleiri, tá til bar at seta fastar handlar á stovn í øðrum havnum.

Á síðsta nevndarfundinum 21. februar komu nakrar viðmerkingar afturat. Nevndin vildi hava, at ein treyt fyri at fáa handilsloyvi var ein ogn upp á 500 ríkisdálar, eins og íslendska lógin ásetti, men prósturin mælti til, at eingin slík treyt var. Nevndin vildi eisini hava, at reglur um karantenu-, loðs- og havnaskipan kom í § 9, og at ásetingarnar um skeinking av breinnivíni fullu burtur. Nevndin mælti til, at frælsi frá keypsavgjaldi hjá fremmandum skipum á 16 kommersulestir ella minni eisini gjørdist galdandi fyri øll onnur skip, og um henda regla varð samtykt, at tað sama eisini gjørdist galdandi í Íslandi. Síðsta tilmælið var, at skipini hjá teimum føstu handlunum fingu loyvi til at flyta vørur til og frá øllum støðum í Føroyum[335].

Tá ið nevndin læt Innanríkisráðnum álit sítt, tók ráðið undir við so at siga øllum, og út frá tí gjørdi tað so eitt nýtt lógaruppskot. Tað arbeiðið var liðugt, beint áðrenn Ríkisdagurin fór í summarfrí, og tí kom málið ikki fyri tá („Rigsdagstidende" 1854a, kol. 59 Anhang A).

### *15.3.5.1 Uppskotið fyri Landstingið*

Á fundi í Statsráðnum 21. juni 1854 legði Tillisch lógaruppskotið hjá stjórnini fram, og kongur tók undir við tí við nøkrum smáum broytingum viðvíkjandi tollskipanini (Jørgensen 1964, kol. 30). So skjótt Landstingið kom saman aftur á heysti 1854, legði Tillisch uppskotið fram har, og hann greiddi í framløguni frá, at hann í uppskotinum hevði fylgt teimum ásetingunum, sum Ríkisdagurin hevði samtykt í íslendsku lógini. Tó var føroyska lógin eitt sindur frælsari viðvíkjandi handilsstøðum og sigling millum ymisku støðini, og so var eitt sindur størri avgjald lagt á spekulanthandil enn á handlarnar í landi („Rigsdagstidende" 1854a, kol. 19).

Í arbeiðinum at skriva álitið hevði Innanríkisráðið serliga lagt seg eftir at tryggja, at vørumangul ikki uppstóð í Føroyum, og at føroyingar fingu fyrimunin av lagaligu handilsprísunum, sum ein kapping átti at tryggjað. Í aðrar mátar helt ráðið, at Ísland og Føroyar líktust so mikið nógv, at til bar at brúka somu reglur („Rigsdagstidende" 1854a, kol. 60 Anhang A).

Í viðmerkingunum til einstøku greinirnar í lógini er týðiligt, at bæði Innanríkisráðið og nevndin av serkønum í stóran mun hildu seg til álitið frá Løgtinginum, og tí minti lógaruppskotið nógv um tað uppskotið, sum Niels Winther hevði lagt fram árið fyri. Umframt at áseta, at fríur handil fyri bæði innlendingar og útlendingar skuldi staðfestast, legði uppskotið eisini upp til, at handilin skuldi vera fríur alla staðni í Føroyum. Eitt avgjald á 2 ríkisdálar varð lagt á hvørja kommersulest, og skip úr útheiminum skuldu leggja inn á Trongisvág ella Havnina

335 SA. Innanríkisráðið. Forhandlingsprotokol hjá Kommissionen af 21. September 1853 til overvejelse af sagen om udvidet handelsfrihed for Island (1853-1854).



*Carl Emil Bardenfleth var fyrstur at taka orðið, tá ið uppskotið hjá serfrøðinganevndini um avtøku av Einahandlinum var fyri í Landstinginum á heysti 1854. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*

at klarerast, áðrenn tey kundu fara í aðrar havnir. Harumframt ásetti lógin, at serlig avgjøld kundu leggjast á skip, sum hoyrdu heima í londum, har donsk skip ikki høvdu somu rættindi sum skip frá landinum sjálvum. Nakað nógv varð gjørt burtur úr, hvussu avgjøldini kundu krevjast inn, og hvussu heilsuvandi kundi fyribyrgjast, men vøruflutningur innanríkis skuldi vera tollfríur. Ein og hvør maður, sum var 25 ár ella eldri og átti vøru ella onnur virði fyri í minsta lagi 500 ríkisdálar kundi fáa handilsloyvi, sum kostaði 2 ríkisdálar („Rigsdagstidende" 1854a, kol. 51-56 Anhang A).

7. oktober 1854 var innleiðandi viðgerð av lógaruppskotinum, og einki uppskot kom um at seta nakra nevnd, so málið fór víðari til fyrstu viðgerð. Til fyrstu viðgerð var Innanríkisráðharrin ikki til staðar, tí hann var upptikin í Fólkatinginum, og av teimum fimm, sum vóru í nevdini, sum Landstingið setti árið fyri, var bara Carl Emil Bardenfleth, stiftamtmaður, til staðar. Bardenfleth segði, at lógaruppskotið „stemmer i alle Hovedspørgsmaal overeens med de Principer, som man var enig om burde følges". Hann var kortini eitt sindur ivasamur um eykaavgjaldið á 3 ríkisdálar, sum skuldi leggjast á spekulanthandlar. Endamálið við hesum avgjaldi var at verja handlarnar á landi móti órímiligari kapping, men Bardenfleth óttaðist fyri, at hetta kundi enda við, at ein einstakur ella nakrir heilt fáir fingu allan handilin á sínar hendur, og so endaði tað við teirri støðuni, at Føroyar fóru frá einum almennum til eitt privat monopol. Júst hesin vandin hevði verið við til at gjørt, at Einahandilin ikki var avtikin fyri langari tíð síðani, og tað var eisini tað, sum lá aftanfyri avgerð Fólkatingsins árið fyri um at hava so fáar avmarkingar sum til bar í handlinum. Bardenfleth vísti eisini á, at onki eykaavgjald varð kravt

*Handilsmaðurin Niels Peter Kirck var saman við Jørgensen prósti og Bardenfleth valdur í nevndina, sum skuldi viðgera uppskotið um avtøkuna av Einahandlinum. (Mynd: Kongliga bókasavnið)*



av teimum handilsvirkjum, sum fluttu vørur í aðrar oyggjar, og tað kundi gera, at smærri handilsmenn, sum byrjaðu á berum, ongantíð fingu møguleikan at koma fyri seg („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 39–42).

Fyrrverandi amtmaðurin á Bornholm Ludvig Krabbe mælti til, at ein nevnd varð sett at gera álit í málinum, tí so nógvir nýggir tinglimir vóru, sum ikki vóru so væl inni í hesum spurninginum, sum teir eldru tinglimirnir vóru. Hetta uppskotið varð samtykt við 30 atkvøðum fyri og 3 ímóti, og tingið avgjørdi eisini, at tríggir limir skuldu vera í nevndini („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 43). Á næsta fundi var nevndarval, har Jørgensen próstur varð valdur við 39 av 40 atkvøðum, Niels Peter Kirck, sum hevði verið í nevndini, sum viðgjørdi handilin í Íslandi, fekk 34 atkvøðu, og Bardenfleth fekk 32 atkvøður („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 48). Seinni hetta heystið segði Bardenfleth seg frá sum landstingsmaður, og tí skuldi nýggjur limur veljast. Tá varð Ludvig Krabbe valdur við 31 atkvøðum („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 90).

Í nevndarálitinum segði nevndin seg kunna taka undir við so at siga øllum í uppskotinum, so tørvur var ikki at gera so nógvar viðmerkingar. Hon helt seg bara hava eina stóra viðmerking og fleiri smáar. Tann stóra var tann sama, sum Bardenfleth hevði nevnt um eykaavgjald á spekulanthandlar. Nevndin vísti á, at endamálið við at loyva spekulanthandlunum var at tryggja, at kapping beinanvegin kom í handilin í Føroyum, og hon vísti eisini á, at Løgtingið hevði lagt dent á, at um handilsfrælsið ikki varð víðfevnt, so vildu føroyingar heldur halda fram við Einahandlinum („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 96 Anhang B). Jørgensen próstur hevði verið formaður í løgtingsnevndini, og



*Ludvig Krabbe, fyrrverandi amtmaður á Bornholm, varð valdur í landstingsnevndina fyri Bardenfleth, tá ið hann valdi at fara úr Landstinginum. (Mynd: wikicommons)*

var aftur formaður í landstingsnevndini, so tí var tað kanska ikki so løgið, at hann endaði viðmerkingarnar til henda spurning við at siga: „Enhver forventet Frugt af Frihandels Indførelse paa Færøerne vilde maaske være tilintetgjort.“ („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 97 Anhang B)

Hinar viðmerkingarnar snúðu seg um at áseta dagin fyri avtøkuna av Einahandlinum til 1. januar 1856, at lata fiskiskip í Føroyum sleppa undan havnagjaldi, at loyva kvinnum framat handilsloyvum við at broyta orðingina um „Enhver der bosat Mand“ til „Enhver, som der holder Dug og Disk“, at sleppa kravinum um eina ávísa ogn fyri at fáa handilsloyvi og gera enskar og hollendskar týðingar av lógini, so útlendskir skiparar kundu fáa hana, tá teir komu til Føroya („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 98 Anhang B).

Nevndarálitið var dagfest 17. januar 1855. Tá hevði Peter Georg Bang, sum var innanríkisráðharri, tá ið uppskot um avtøkuna av Einahandlinum varð gjørt í 1852, ein mánað frammanundan skipað nýggja stjórn í Danmark, har hann var bæði forsætisráðharri og innanríkisráðharri. Tí var tað hann, sum greiddi frá støðu stjórnarinnar, tá ið málið aftur var til viðgerðar í Landstinginum 22. januar 1855. Stjórnin tók undir við øllum teimum broytingunum, sum nevndin mælti til, so bæði broytingarnar, og lógaruppskotið í síni heild fóru einmælt gjøgnum Landstingið („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 121–137). 25. januar var triðja viðgerð, men har komu hvørki broytingar ella viðmerkingar til lógaruppskotið, sum varð einmælt samtykt við 44 atkvøðum („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 170).

### *15.3.5.2 Fólkatingið samtykkir lógina*

Á Fólkatingi boðaði formaðurin 27. januar 1855 frá, at hann hevði fingið lógaruppskotið, sum var samtykt í Landstinginum („Rigsdagstidende“ 1854b, kol. 393). Eingin tók orðið til fyrstu viðgerð, og málið fór einmælt til 2. viðgerð („Rigsdagstidende“ 1854b, kol. 961). Undir aðru viðgerð segði Alfred Hage, at honum hevði dámt betur tað uppskotið, sum Fólkatingið samtykti árið fyri, tí har vóru færri forðingar í. Hann helt, at tað var óheppið, at skip undir 15 kommersulestir ikki kundu handla í Føroyum, og at skip uttan úr heimi bara kundu fara í tvær havnir, eins og hann helt tað vera spell, at avgjaldið upp á tveir ríkisdálar fyri hvørja kommersulest var komið innaftur. Hetta vóru alt forðingar, sum eftir hansara tykki bara fóru at skaða handilin í Føroyum, samstundis sum eingin fyrimunur var av teimum („Rigsdagstidende“ 1854b, kol. 1169–70).

Løgmálaráðharrin umboðaði stjórnina, tí innanríkisráðharrin var sjúkur, og hann helt, at tá ið Løgtingið hevði tikið undir við hesum viðurskiftunum, so var tað ikki rætt av Ríkisdegnum at gera broytingar, tí Løgtingið var tann myndugleiki, sum kendi føroysku viðurskiftini best og visti, hvør føroyski tørvurin var („Rigsdagstidende“ 1854b, kol. 1171). Hage helt, at tað meir enn so kundi hugsast, at Løgtingið hevði verið varið í sínum ynskjum, tí tað vildi tryggja sær, at fríhandilin kom („Rigsdagstidende“ 1854b, kol. 1172). Ongin annar tók orðið, og lógaruppskotið varð einmælt samtykt og koyrt til triðju viðgerð („Rigsdagstidende“ 1854b, kol. 1174). Til triðju viðgerð tók eingin orðið, og uppskotið varð einmælt endaliga samtykt („Rigsdagstidende“ 1854b, kol. 1391).

Bæði í Landstinginum og Fólkatinginum boðaðu formenninir 2. apríl 1855 frá, at kongur hevði staðfest 8 lógir frá Innanríkisráðnum, og teirra millum var lóg frá 21. mars um avtøku av Einahandlinum („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 1329). Tá var greitt, at frá ársskiftinum fór fríhandil at verða galdandi í Føroyum.

## *15.4 Samandráttur*

Tá ið tilmælið frá nevndini, sum í 1842 mælti til at avtaka Einahandilin í Føroyum, ikki varð fylgt av stjórnini, endaði málið í Stættatinginum í 1844. Har var eingin ivi um, at tilmælið frá nevndini var rætt, og nevndin, sum Stættatingið setti at viðgera spurningin, helt heldur ikki, at tað førdi nakran veg at royna at menna eitt vinnulív, áðrenn Einahandilin varð avtikin. Í hesum byrjandi fólkaræðinum vóru menn vísir í, at vinnuligt frælsi var fortreytin fyri einum mentum vinnulívi. Stættatingið helt heldur ikki, at vandarnir, sum higartil høvdu forðað fyri, at Einahandilin var avtikin, høvdu nakað upp á seg.

Ein av stóru forðingunum fyri at avtaka Einahandilin hevði higartil verið, at føroyingar vóru á einum ov lágum menningarstigi til at fáa fyrimunirnar av fríhandli, men tann grundgevingin varð tikin av borðinum, tá ið tingmenn staðfestu, at føroyingar vóru minst líka mentaðir, sum danska almúgan var. Hesi

sjónarmiðini á Stættatingi samsvaraðu ikki við tað, sum Rentukamarið hugsaði, og tí helt Rentukamarið fram við royndum sínum at fyrireika føroyingar til frían handil við at royna at menna eina fiskivinnu.

Tá ið Stættatingið aftur viðgjørdi føroyska handilin í 1846, var P.G. Bang, sum umboðaði kong og Rentukamarið, vísur í, at fiskivinna ikki fór at hava so stóran týdning í Føroyum í framtíðini, sum roknað hevði verið við. Tað merkti eisini, at fyrireikingarnar til at avtaka Einahandilin í teirra eygum vóru miseydnaðar, og at stjórnin tí var av somu áskoðan sum tingmenn um, at fortreytin fyri eini mentari vinnu var, at fríur handil varð innførdur. Rentukamarið ávarðaði bara um, at ein tíð fór at ganga, áðrenn verulig gongd fór at koma á búskaparligan vøkstur í Føroyum.

Stættatingið 1846 avgjørdi at heita á kong um at koma við einum lógaruppskoti um avtøku av Kongliga einahandilinum á komandi Stættatingi, men tað kom ongantíð so langt, tí Stættatingið kom ongantíð saman aftur, og tað var um reppið, at kongur sjálvur varð avtikin hesi árini. Í staðin fyri Stættatingið varð eitt grundlógargevandi ting savnað í 1848, og tað tók undir við at avtaka Einahandilin, men av lógartekniskum ávum varð tann greinin, sum henda avgerð stóð í, ikki samtykt.

Fólkatingið samtykti í apríl 1851, at lóg skuldi gerast um avtøku av Einahandlinum, men politiska viðgerðin var drúgv, so nærum fýra ár gingu, áðrenn sama ting endaliga kundi samtykkja lógina, sum avtók handilin 1. januar 1856. Ein orsøk til hesa drúgvu gongd var, at lógaruppskotið skuldi ígjøgnum so nógvar nýggjar stovnar, og innanríkisráðharrarnir, sum varðaðu av lógini, vóru ættiliga ofta skiftir út hesi árini. Høvuðsforðingin fyri at fáa lógina samtykta var ikki longur, at føroyingar ikki vóru til reiðar, men heldur at roynt var at vinna donskum handilsáhugamálum onkur serrættindi, og í øðrum lagi var roynt at tryggja, at tað ikki fór at merkjast í statskassanum, at Einahandilin hvarv.

Hugsanin hjá fólkaræðisligu skipanini um, at tað ikki bar til at fyrireika føroyingar til fríhandil, tí júst Einahandilin var størsta forðingin fyri øllum fyrireikingum, var eitt brot við fatanina hjá mongum av teimum embætismonnunum, sum gjøgnum árini høvdu fingist við spurningin so ella so. Stutta viðmerkingin hjá Jørgensen próst i, tá ið málið var til triðju viðgerð í Landstinginum, man í so máta vera umboðandi fyri hugsanina hjá flestu av embætismonnunum í Føroyum. Jørgensen ásannaði við sínum 16 ára royndum í Føroyum, at Einahandilin hevði verið størsta forðingin fyri framburði í landinum, men hann viðgekk eisini, at málið ikki hevði gingið júst soleiðis, sum hann kundi hugsað sær, tí:

> Jeg har tidligere troet, at det vilde være gavnligt, om der kunde være skeet en ikke saa brat Overgang; men Omstændighederne have ikke villet tillade det, og der er derfor vistnok ikke Andet for nu end at vove dette Skridt, uden videre Forberedelse at frigive Handelen („Rigsdagstidende“ 1854a, kol. 170).

Vanlig hugsan var, at handilin nú fór at verða fríur uttan stórvegis fyrireikingar,

men allar tær royndirnar, sum høvdu verið gjørdar at menna eina fiskivinnu í Føroyum, vóru ikki so úrslitaleysar, sum myndugleikarnir hildu. Málið við royndunum var ikki nátt, men royndin at koma har til hevði sett gongd í onnur ting, sum gjørdu, at gongd kom á eina fiskivinnu í Føroyum, áðrenn Einahandilin hvarv, og henda gongd gjørdi sítt til, at føroyingar ikki vóru púra ófyrireikaðir til fría handilin. Hesum verður greitt frá í komandi kapitli.

# 16. kapittul
# *Útróðurin verður vinnuligur*

Rentukamarið slepti vónunum um at menna eina fiskivinnu, tá ið tað í 1846 kom til ta niðurstøðu, at kongligu fiskivinnuroyndirnar vóru miseydnaðar, og á Stættatingi kom til sjóndar, at tiltrúgvin til eina komandi fiskivinnu í Føroyum var fánað. Fyri fólkavaldu umboðini í nýspretta fólkaræðinum var av hugsjónarligum ávum torført at síggja nakað virði í at menna vinnu í einari ófrælsari skipan, tí fyri hesar politikararnar var vinnuligt frælsi sjálv fortreytin fyri slíkari menning.

Orsøkin til, at kongsins embætismenn hildu royndirnar vera miseydnaðar, var fyrst og fremst tí, at tað ikki hevði eydnast so væl at menna føroyingar til havgangandi fiskiskap. Tað var upprunaliga endamálið við royndunum, og tá ov lítið kom burtur úr í so máta í mun til tær útreiðslur, sum kongsins kassar høvdu av royndunum, vóru royndirnar í teirra eygum miseydnaðar. Embætismenninir í Føroyum vóru av einari aðrari áskoðan, tí teirra royndir vóru, at øll henda fyrireikingin til at avtaka Einahandilin, hevði sett gongd í nakað nýtt í Føroyum. Teir høvdu sæð, at føroyingar eftir stuttari tíð megnaðu at gerast frægastu fiskimenn á donsku skipunum, og royndirnar høvdu eisini prógvað, at tað bar til at virka góðan klippfisk í Føroyum, og føroyskir útróðrarmenn høvdu longu tikið væl undir við møguleikanum at avreiða ráfisk.

Í Rentukamarinum vóru teir vónbrotnir, tí at fiskurin ikki varð fiskaður við skipi, sum teir høvdu sæð fyri sær, men fyri embætismenninar í Føroyum var avgerandi broytingin, at fiskurin varð framleiddur til ta vøruna, sum varð grundarlag undir einari nýggjari vinnu. Vinnuliga menningin av aldagamla útróðrinum var liðurin, sum vantaði í roknistykkinum hjá Rentukamarinum, og tað var júst vinnuliggerðingin av aldagamla útróðrinum, sum gjørdist avgerandi skiftið í at menna Føroyar til eitt fiskivinnusamfelag.

Tá ið tað bara vóru amtmaðurin og hansara menn, sum løgdu merki til, hvussu klippfiskaframleiðslan ávirkaði útróðurin og samfelagið alt, gjørdist tað til ein av høvuðsuppgávum hansara áhaldandi at tryggja, at henda menning slapp at halda fram. Fyri amtmannin hevði tað stóran týdning, tí hann helt framvegis, at ein ment fiskivinna var vegurin burtur úr gamla samfelagnum, har „gammel Skik“ og einahandil ráddu. Av tí sama var lítið at siga til, at tað vóru berandi kreftirnar í bóndasamfelagnum og serliga teir, sum umsótu Einahandilin, sum av øllum alvi royndu at leggja forðingar í vegin fyri menningini av modernaða samfelagnum.

Í hesum partinum verður hugt at menningini av ráfiskamóttøkuni og klippfiskaframleiðsluni í Álakeri, og hvussu privatpersónar seinni fóru undir líknandi virksemi aðra staðni í landinum. Serliga nógv verður gjørt burtur úr tí, sum

amtmaðurin gjørdi fyri at stuðla hesum virkseminum, og hvussu hann alla tíðina royndi at berjast ímóti teimum, sum helst vildu steðga framburðinum.

## *16.1 Klippfiskavirkingin økist*

Einahandilin hevði við prísum sínum syrgt fyri, at eingin varandi menning av klippfiskaframleiðslu var byrjað, áðrenn kongligu royndirnar byrjaðu í 1844. Royndirnar, sum vóru gjørdar at framleiða klippfisk í 1835-36, hildu uppat, tá ið prísurin lækkaði munandi, men gongd kom á aftur, tá ið prísurin í 1841 hækkaði til 5 skillingar fyri pundið. Í 1841 seldi Einahandilin 4.096 pund av klippfiski og árið eftir 23.520 pund. Handilsstjórnin valdi at lækka prísin aftur í 1843, og tað mundi gjørt enda á klippfiskinum, tí komandi tvey árini vóru bara góð 1.000 pund útflutt um árið.

Heilt øskukalt gjørdist tað ikki, og tá ið føroyingar í 1845 fingu høvi at avreiða ráfisk til klippfiskaframleiðsluna hjá kongligu royndarskipunum, sum greitt er frá í 13. kapitli, setti tað gongd í ein nýggjan vinnumøguleika. Loyvið til at avreiða í Havn var nógv brúkt hesi bæði árini 1845-46 bæði av havnarmonnum og bátum av bygd, sum komu til Havnar við ráfiski. Sjálvt um sjúka hevði verið í 1846, vóru 4210 toskar avreiddir til fiskavrakaran Jacobæus og hansara fólk, sum tey fingu 20 skippund 3 lispund og 5 pund av klippfiski burturúr.

### 16.1.1 Rentukamarið heldur fram við virkseminum í 1847

Tá ið kongligu fiskiroyndirnar hildu uppat, varð spurningurin, hvat skuldi henda við møguleikunum at avreiða ráfisk og framleiða klippfisk, tí tá ið royndirnar endaðu, var samstundis greitt, at fiskavirkarin átti at verið sagdur úr starvi. Rentukamarið tók tó atlit til teir fyrimunirnar, sum klippfiskaframleiðslan hevði skapt, og avgjørdi, at Jacobæus skuldi halda fram við virksemi sínum í 1847.

Rentukamarið avgjørdi, at Jacobæus framhaldandi skuldi fáa 600 ríkisdálar um árið í løn fram til 1. november 1848, so hann kundi virka undir somu treytum, sum resolutiónin frá 21. februar 1845 ásetti. Rentukamarið vildi kortini ikki gjalda útreiðslurnar sjálvt og avgjørdi tí, at frá 1. januar 1847 skuldi tað vera handilin, sum tók hesa útreiðslu á seg. Umframt virkingina sjálva skuldi Jacobæus hesa tíðina eisini undirvísa øllum føroyingum, sum gjøgnum Pløyen amtmann vístu áhuga fyri tí, hvussu fiskurin varð flaktur, saltaður og virkaður til góða handilsvøru[336]. Hesi boðini vóru helst kærkomin hjá amtmanninum, og 8. apríl 1847 fór Pløyen at bera Jacobæusi boðini, og Jacobæus tók av møguleikanum[337].

Í frágreiðing um landsins støðu kundi amtmaðurin 9. august 1847 boða frá, at handilin higartil hevði keypt 8000 lispund av ráfiski frá bátum úr Streymoynni,

336 SA. Rentekammeret. Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland. Løbenummer: 373.12. Resolutión 19. februar 1847

337 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 172. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 8. apríl 1847.



*Rentukamarið avgjørdi, at Jacobæus skuldi halda fram at taka ímóti ráfiski í Álakeri í 1847, sjálvt um kongligu fiskiroyndirnar vóru steðgaðar. (Mynd Tjóðsavnið 3350F02642)*

Eysturoynni og Sandoynni[338]. Stutt eftir helt handilin uppat at taka ímóti fiski, og tá ið gjørt varð upp, hevði handilin keypt tilsamans 8082 lispund fyri 1 skilling pundið ella fyri tilsamans 1350 ríkisdálar, og fiskurin varð útfluttur sum 3419 lispund av virkaðum klippfiski[339]. Fiskurin varð í Keypmannahavn seldur fyri 16 ríkisdálar og 84 skillingar fyri skippundið. Av hesum vóru 10 ríkisdálar latnir føroyingum í gjaldi fyri ráfiskin, men Handilsstjórnin helt ikki, at eitt yvirskot upp á 6 ríkisdálar og 84 skillingar var nóg mikið til at gjalda fyri framleiðslukostnaðin og kostnaðin av flutningi, pakkhúsplássi, trygging og øðrum.

At halda fram við einum virksemi, sum gav undirskot, var ikki nakað, sum hóskaði til Handilsstjórnina, men hon valdi kortini at halda á við virkseminum, tí Nolsøe handilsforvaltari hevði sagt, at tað hevði verið „til Gavn for Indbyggerne“. Tí ætlaði Handilsstjórnin at fara at kanna, um tað ikki bar til at skipa framleiðsluna betur í framtíðini, soleiðis at tað slapst av við undirskotið. Rentukamarið tók undir við Handilsstjórnini í hesi avgerð, og tí varð avgjørt, at virksemið hjá Jacobæusi skuldi halda fram í 1848, tá ið Jacobæus kortini ikki varð uppsagdur fyrr enn 1. november. Rentukamarið sá fram til at fáa eitt uppskot frá Handilsstjórnini

338 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 202. Bræv til Rentukamarið dagfest 9. august 1847.
339 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 229. Bræv til Rentukamarið dagfest 15. desember 1847.

um, hvussu klippfiskavirkingin kundi skipast framyvir, uttan at tað kostaði handlinum alt ov nógv[340].

Í brævi frá handilsforvaltaranum Nolsøe til Lunddahl, sum var virkandi amtmaður, sæst, at handilin í 1847 hevði keypt 13.729 fiskar. Einki stóð í bókunum um, hvaðani fiskurin var komin, tí tað var lættari at skriva „Fra Adskillige", men Jacobsen bókhaldari visti at siga, at fiskur umframt úr Havn var komin úr Hesti, Nólsoynni, Kirkjubø og av Toftum. Harumframt segði handilsforvaltarin, at „Fiskeberederens Uforsigtighed" var orsøkin til, at 609 fiskar skolaðu aftur í havið, og tí gjørdist samlaða úrtøkan 3419 lispund av klippfiski.[341] Longu her hómast ein byrjandi tvídráttur millum fiskavirkaran Jacobæus og handilsforvaltaran Nolsøe, sum fekk stóra ávirkan á menningina av fiskavirkingini komandi árini, og sum amtmaðurin tí legði nógva orku í at loysa.

### 16.1.2 Klippfiskavirkingin skipað av nýggjum

At Rentukamarið hevði avgjørt, at Jacobæus skuldi halda fram í starvi sínum til 1. november 1848, gav Handilsstjórnini eitt sindur av tíð til at finna út av, hvussu hon vildi hava klippfiskavirkingina skipaða frameftir. Nolsøe handilsforvaltari hevði víst á, hvussu stóran týdning henda framleiðsla hevði, og tí spurdi Handilsstjórnin hann 14. mars 1848, hvør hansara hugsan var um, hvussu hetta virksemið á bestan hátt kundi skipast í framtíðini. Í álitinum um spurningin skuldi hann m.a. taka atlit til, um keyp og virking av ráfiski kundi vera aðrastaðni enn í Havn, um tað við úthandlarnar vóru hóskandi støð at virka fisk á, hvat tað hevði kostað at fingið gongd í virking á hesum støðum, og um einstaklingar vóru í Føroyum, sum høvdu evnini og royndirnar at yvirtaka virkingina, og hvat slíkir innføddir fiskaframleiðarar høvdu kostað. Handilsstjórnin gekk út frá, við teimum upplýsingum, sum handilsforvaltarin hevði givið henni, at hann ikki vildi hava Jacobæus at halda fram, men um hann heldur vildi tað, so kundi hann greiða frá, hvørjum treytum Jacobæus kundi arbeiða undir. Handilsstjórnin vildi at enda hava, at handilsforvaltarin greiddi henni frá virkseminum hjá Jacobæusi higartil[342], og tað gevur eisini eina greiða ábending um, at teir, sum stjórnaðu handlinum, ikki vóru nøgdir við hann.

Amtmaðurin fekk sama dag boð um, at fiskavirkingin fyri handilsins rokning skuldi halda fram, og at Nolsøe handilsforvaltari hevði fingið til uppgávu at gera ítøkiligt uppskot um, hvussu henda virking í framtíðini skuldi skipast og møguliga

340 SA. Rentukamarið. 1773-1848 Afskrifter af eller koncepter til (Færøerne og Grønland). Resolution angaaende den færøiske Handelstaxt for Aaret 1848 dagfest 8. mars 1848.

341 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 196. Bræv frá Nolsøe handilsforvaltara til Lunddahl, fyribilssettan amtmann dagfest Thorshavns Handelssted 14. desember 1847.

342 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 320. Bræv frá handilsstjórnini til Nolsøe handilsforvaltara dagfest 14. mars 1848. Her í avriti til amtmannin.

víðkast. Amtmaðurin var eisini biðin um at siga sína hugsan um uppskotið hjá handilsforvaltaranum, tá ið tað einaferð kom[343].

*16.1.2.1 Jacobæus leitar eftir øðrum starvi*

Jacobæus mundi vita okkurt um, at teir í handlinum ikki vóru nøgdir við hansara arbeiði, og at hann tí helst einki arbeiði fór at hava eftir 1. november. Hann søkti tí gjøgnum amtmannin um, at hann og familja hansara kundi fáa árligan studning úr handilskassanum, og samstundis søkti hann eisini um at fáa eitt hóskandi embæti í Danmark. Rantukamarið svaraði, at tað ikki kundi geva honum stuðul úr handilskassanum, og tað hevði heldur einki arbeiði at bjóða honum í Danmark. Hinvegin var einki í vegin fyri, at øll familjan slapp ókeypis við onkrum av handilsins skipum[344].

Avslagið upp á studning og upp á at fáa annað starv í Danmark gjørdi helst sítt til, at Jacobæus søkti um at sleppa at halda fram sum fiskavirkari í Havn. Tá ið Handilsstjórnin fekk umsóknina frá Jacobæusi, helt hon ikki, út frá teirri vitan, sum hon hevði fingið um virksemi hansara higartil, at tað var rætt at seta hann aftur í starv. Handilsstjórnin skrivaði til amtmannin um málið og læt tað vera upp til amtmannin at taka avgerð. Helt amtið ikki, at brúk var fyri honum longur, skuldi tað boða Jacobæusi frá[345].

Amtmaðurin valdi at verja Jacobæus, og hann segði, at sjálvt um nógvar atfinningar høvdu verið móti honum, helt amtið ikki, at nakar ivi var um, at Jacobæus dugdi sítt arbeiði væl. Stóri trupulleikin var, at hann fekk ov nógva løn fyri at arbeiða í 5 ella 6 mánaðir, og tí mælti amtmaðurin til, at Jacobæus slapp at halda fram, men fyri væl minni løn. Amtmaðurin var eisini samdur við Handilsstjórnina um, at Jacobæus bara var settur fyri eitt ár á gangin. Spurningurin, um nakar annar var í Føroyum, sum kundi standa fyri fiskavirking, var torførur at svara so brádliga. Í Havn var ein skilamaður, sum hevði arbeitt í fiskavirkingini í Álakeri í nøkur ár, og amtmaðurin helt, at tað hevði komið sera væl við, um fiskur varð keyptur í fleiri støðum enn bara í Havn, men hann læt tað verða upp til álitið frá handilsforvaltaranum at gera neyvari ætlanir um tað[346].

Úrslitið varð, at Jacobæus aftur í 1848 tók ímóti og virkaði fisk á sama hátt, sum hann hevði gjørt síðstu árini. Frá 1. mai til 31. august 1848 tók hann vegna handilin ímóti 13.673 fiskum, sum í tali var eitt sindur meir enn árið fyri.

---

343 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 320. Bræv frá handilsstjórnini til amtmannin dagfest 14. mars 1848.

344 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 435. Bræv frá Rentukamarinum til amtmannnin dagfest 27. mai 1848.

345 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 518. Bræv frá handilsstjórnini til amtmannin dagfest 13. juli 1848.

346 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 280. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 14. september 1848.



*Viðarnes og bygningurin í Álakeri tíðliga í tíðini. (Mynd: Tjóðsavnið 4279F22)*

Fiskurin vigaði væl minni enn árið fyri, tí hann vá bara 5.677 lispund, men tað átti at givið handilinum góð 94 skippund av klippfiski[347].

Anton Degn roknaði upp á júst hesi tølini, og hansara útrokningar vístu, at henda fiskavirkingin ikki var nøkur góð forrætning fyri Einahandilin, tí hann í 1848 hevði 511 ríkisdálar í undirskoti av fiskinum. Orsøkin var serliga, sum amtmaðurin eisini vísti á, at fiskavirkarin Jacobæus fekk so stóra løn. Tey 94 skippundini og 199 pundini, sum handilin útflutti í 1848, høvdu kostað teimum 5,8 skillingar fyri pundið í keypi og framleiðslu, og í Keypmannahavn fingust bara 4,2 skillingar fyri pundið. Anton Degn metti, at hetta undirskotið sjálvandi hevði við sær, at handilin ikki gjørdi nakað serligt fyri at eggja føroyingar til at avreiða meira av ráfiski. Handilin kláraði altíð at selja turran fisk við yvirskoti, men verjutollur var á klippfiski, har sum hann skuldi seljast, og sjálvt um undirskot ikki var hvørt ár, so var tað ein greiður fyrimunur fyri Einahandilin at halda seg til turra fiskin (Degn 1929: 26).

Gav klippfiskaframleiðslan handlinum undirskot, so var hesin møguleikin sera kærkomin hjá havnarfólki. Tí vildu havnarfólk eisini hava, at økt varð um møguleikan, og tí heittu fleiri havnarfólk við organistinum M. Jacobsen á odda 6. september 1848 á myndugleikarnar um at fáa víðkað møguleikarnar at avreiða ráfisk til at verða alt árið[348]. Sjálvt um amtmaðurin helst var fegin um henda áhugan fyri nýggja vinnumøguleikanum, valdi hann í viðmerkingunum, sum hann skrivaði, tá ið hann sendi áheitanina víðari til Rentukamarið, ikki at gera so

347 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 278. Bræv til Rentukamarið dagfest 14. september 1848.

348 TSS. Færø Amt. Færø Amts Journal litra S, nr. 600. Brævið er ikki í amtssavninum, tí tað er sent víðari til Rentukamarið.

nógvar viðmerkingar til hetta, fyrr enn uppskotið, sum Nolsøe handilsforvaltari skuldi koma við, var komið. Hann viðmerkti kortini, at „Modtagelsen af Raafisk upaatvivleligen er en særdeles gavnlig Foranstaltning, hvormed en for Fiskerne fordeelagtig Pris paa den raa Fisk, formeentligen lader sig forene med den kongelige Handels Tarv."[349] Vónin um, at klippfiskaframleiðslan fór at gerast ein fyrimunur fyri bæði føroyingar og fyri Einahandlin, var ikki brostin enn.

**16.1.3 Amtmaðurin og handilsforvaltarin stýra virkseminum í Álakeri í felag**

Fleiri ferðir vísti amtmaðurin í 1848 á, at hann vildi bíða við at siga so nógv um ymiskar spurningar, til álitið, sum Handilsstjórnin hevði biðið handilsforvaltaran koma við, var klárt. Óvist er, um handilsforvaltarin nakrantíð skrivaði nakað álit, tí einki sæst til, at amtmaðurin hevur fingið eitt slíkt at gera viðmerkingar til. Tað næsta, sum hendi, var tí, at Handilsstjórnin skrivaði eitt tilmæli til Innanríkisráðið um, hvussu ráfiskamóttøkan og klippfiskavirkingin skuldu skipast í framtíðini. Ráðið legði málið fyri kong, og hann gav sítt viðmæli 27. februar 1849.

Í tilmælinum stóð, at virksemið í Havn skuldi halda fram sum higartil, men tíðin fyri móttøku av fiski skuldi víðkast til at verða frá 1. apríl til endan á august, og prísurin skuldi framvegis vera 1 skillingur fyri pundið. Yvirvektin, sum virkarin higartil hevði fingið, skuldi falla burtur, soleiðis at eingin avrunding varð gjørd í vektini, tá ið fiskurin varð latin handilsforvaltaranum. Lønin hjá fiskavirkaranum skuldi í mesta lagi vera 400 ríkisdálar árliga, og virkingarpeningur og dusørur skuldu hava eitt hámark á ávikavist 1 ríkisdála og 32 skillingar og 32 skillingar fyri skippundið av virkaðum fiski. Í aðrar mátar læt Handilsstjórnin tað vera upp til amtmannin og handilsforvaltaran at taka sær av at taka avgerðir í ymiskum spurningum.

Tað var tí upp til teir báðar at avgera, um víðkast skuldi um tíðina, har Jacobæus tók ímóti fiski, og teir kundu eisini avgera, um fiskur undir ¾ alin skuldi keypast fyri ¾ skilling fyri pundið. Harumframt legði Handilsstjórnin allan spurningin um at taka ímóti fiski aðrastaðni í landinum og flyta hann saltaðan til Havnar at viðgera yvir til amtmannin og handilsforvaltaran at taka støðu til. Einasta treytin hjá Handilsstjórnini var, at útreiðslurnar fyri handilin ikki máttu gerast ov stórar. Amtmaðurin fekk eisini ábyrgdina av saman við handilsforvaltaranum at seta Jacobæus ella onkran annan í starv sum fiskavirkara, og teir skuldu eisini áseta lønina og dusørin innanfyri ásettu hámørkini.

Amtmaðurin fekk eisini til uppgávu at taka sær av øðrum avgerðum, eftir at hava ráðført seg við handilsforvaltaran, so sum at skriva ein instrux til fiskavirkaran og annað, sum hevði samband við tað[350]. Sostatt var tað eftir hetta í stóran mun

---

349 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 296. Bræv til Rentukamarið dagfest 5. november 1848.

350 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 763. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 3. mars 1849.

upp til amtmannin at taka avgerðir um, hvat gerast skuldi við fiskaframleiðslu í Føroyum.

### *16.1.3.1 Jacobæus fær reglugerð at arbeiða eftir*

Fáar dagar eftir, at Innanríkisráðið hevði sent boðini til amtmannin, boðaði Handilsstjórnin frá, at hon hevði einki ímóti, at Jacobæus varð settur aftur í starv. Hinvegin vildi hon fegin hava, at tað í instruxunum til fiskavirkaran kom at standa, at hann skuldi halda neyvan roknskap við øllum tí, sum hann fekk ábyrgdina av, so tað gjørdist bindandi fyri hann, og hann skuldi eisini hava skyldu til at læra føroyingar upp í fiskavirkingini, um amtmaðurin bað hann um tað[351].

Lunddahl fúti, sum var virkandi amtmaður, og handilsforvaltarin vórðu skjótt samdir um at seta Jacobæus aftur í starv, og longu tíðliga í aprílmánaði 1849 var handilsforvaltarin til reiðar at geva Jacobæusi tey instruxini, sum Handilsstjórnin mælti til at gera. Í ínstruxunum avgjørdi hann at geva Jacobæusi ta samsýningina, sum Handilsstjórnin hevði sett sum hægsta mark, og hann tók eisini avgerð um at taka ímóti fiski undir ¾ alin fyri ¾ skillingar fyri pundið. Fiskurin, sum kundi avreiðast, skuldi vera feskur, rætt flaktur og í heila tikið væl viðfarin.

Jacobæus skuldi føra allar avreiðingar inn í bók við neyvum uppgerðum av tali av fiskum og vekt. Hann skuldi eisini lata útróðrarmonnum eina váttan upp á móttøkuna, so teir kundu fara á skrivstovuna í handlinum eftir pengunum. Jacobæus skuldi harumframt føra neyvt bókhald yvir nýtsluna av salti frá handlinum. Vantaði okkurt tilfar ella reiðskapur í framleiðsluni, skuldi Jacobæus venda sær til handilsforvaltaran, so fiskurin ikki versnaði av vantandi útbúnaði. Øllum hesum skuldi Jacobæus eisini hava neyvt yvirlit yvir og greiða frá við ársenda. At enda vildi handilsforvaltarin hava, at tað varð sagt týðiliga við fiskavirkaran, at hann skuldi hava ordan í framleiðsluni, og hann skuldi ansa eftir briminum[352].

### *16.1.3.2 Carl Emil Dahlerup verður nýggjur amtmaður*

Pløyen amtmaður, sum hevði gjørt so nógv fyri at fáa gongd á eina fiskivinnu í Føroyum, kom ongantíð at fáa nakran leiklut í hesi nýggju skipanini av virkseminum í Álakeri, tí hann kom ikki aftur til Føroya, eftir at hann var farin niður at virka sum kongsvalda umboð føroyinga á grundlógartingi. Í staðin var tað Lunddahl fúti, ið sum virkandi amtmaður kom at taka fyrstu avgerðirnar. Hann hevði síðani 1830-árini víst, at hann í flestu lutum var samdur við Pløyen, tá ið talan var um eina komandi fiskivinnu, so tað gjørdi helst ikki so stóran mun.

Henda støðan broyttist tó sama dag, sum Innanríkisráðið hevði avgjørt at taka undir við tilmælinum frá Handilsstjórnini, tí tann dagin, 3. mars 1849, boðaði Innanríkisráðið frá, at tað hevði sett C.E. Dahlerup sum nýggjan amtmann í

351 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 775. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 7. mars 1849.

352 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 856. Bræv frá handilsforvaltara Nolsøe dagfest 4. apríl 1849.



*Nógv virksemi er á Viðarnesi og langt niðan í Álakersbøin. Húsið til vinstru er pakkhúsið hjá Jacobæusi, og húsini ovast í bønum høgrumegin eru Hornahúsini, har uppsitarin hjá amtmanninum búði. (Mynd: Tjóðsavnið 5207F47.926)*

Føroyum[353]. Tað fór tí at verða upp til hansara at stýra klippfiskavirkseminum, men Dahlerup kom ikki til Føroya beinanvegin. Dahlerup kom 4. juli 1849, og júst henda sama dagin gjørdi amtmaðurin viðmerkingar til tann instruxin, sum Jacobæus skuldi arbeiða eftir. Tí er tað eitt sindur óvist, um tað var Dahlerup ella Lunddahl, sum gjørdi viðmerkingarnar[354]. Umframt at taka undir við uppskoti handilsforvaltarans, mælti amtmaðurin til, at Jacobæus eisini skuldi hava skyldu til at læra allar føroyingar, sum amtmaðurin sendi til hansara, at flekja og salta og annað, sum skuldi til at gera góðan klippfisk, og at tað varð bannað Jacobæusi at taka ímóti fiski til virkingar fyri aðrar enn handilin. Hann skuldi heldur ikki goyma fisk fyri onnur, heldur ikki sín egna, í pakkhúsinum í Álakeri, um amtmaðurin ikki hevði givið loyvi til tess. Amtmaðurin vónaði, at Jacobæus í „alle Maader henholder dem saavel i denne Deres Tjeneste, at den kongelige Handels Tarv saa godt som muligt kan blive iagttaget ved dette til Fordeel for Indbyggerne paa Færøe sigtende Foretagende.“[355]

353 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 762. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 3. mars 1849.

354 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 273. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 2. november 1853.

355 TSS. Færø Amt. Kopibók AA, bræv nr. 501. Instrux frá amtmanninum til Jacobæus fiskavirkara dagfest 4. juli 1849.

### 16.1.4 Dahlerup víðkar um avreiðingarmøguleikarnar

Dahlerup amtmaður fylgdi frá byrjan av væl við gongdini í klippfiskaframleiðsluni, og hann merkti eisini stóra áhugan millum føroyingar fyri hesum nýggja vinnumøguleikanum, tí hann fekk hópin av áheitanum um at víðka um møguleikarnar bæði við at økja um tíðina, har til bar at avreiða ráfisk, og við at skapa møguleikar fyri at taka ímóti ráfiski aðra staðni í landinum. Várið í 1849 var ikki so gott til fiskiskap, tí veðrið lagaði seg so illa, men hinvegin var julimánaður frálíkur. Frá 1. apríl til 9. august keypti handilin 10.000 lispund av ráfiski, tað mesta av tí í juli, og tá ið augustmánaði 1849 var liðugur, hevði handilin tikið ímóti 12.981 lispundum av ráfiski. Í sambandi við fráboðan um hesa veiðu í regluligu frágreiðing síni til Innanríkisráðið segði amtmaðurin, at fiskurin var komin úr Eysturoynni, Streymoynni og nakað úr Sandoynni, men hann helt ikki nakran iva vera um, at væl meir kundi verið fiskað í Norðoyggjum, í Vágum og í Suðuroy, um hesar sýslur fingu líka góðar møguleikar at sleppa av við ráan fisk, sum hinar oyggjarnar høvdu.

Innanríkisráðið hevði í avgerð síni frá 27. februar 1849 latið tað verða upp til amtmannin og handilsforvaltaran í felag at taka avgerð um, um loyvi skuldi gevast til at taka ímóti fiski kring landið, men einki var hent, tá ið Dahlerup amtmaður kom til Føroya. Tá ið Dahlerup hevði verið í Føroyum í ein góðan mánað, tók hann spurningin upp. Hann spurdi seg fyri hjá Jacobæusi, hvørjir møguleikar vóru, men har fekk hann at vita, at tað í august var ov langt útliðið, til at nakað kundi gerast tað árið. Amtmaðurin avgjørdi kortini at kanna, um handilsstøðini kundu útgerast til at taka ímóti fiski og salta hann, so hann kundi flytast til Havnar til víðari viðgerðar, tá ið høvi beyðst. Hesar royndirnar skuldu brúkast sum grundarlag til eitt gjølligari uppskot um, hvat rætt var at gera[356].

Dahlerup amtmaður sá beinanvegin, at í Norðoyggjum og Suðuroynni vóru upplagdir møguleikar at økja um framleiðsluna, tí at norðoyingar fiskaðu nógv meir enn aðrir, so tað var uttan iva skilagott at skipa so fyri, at teir fingu møguleikan at avreiða ráfisk. Teir, sum ikki fingu avreitt í Havn, hildu fram við at turka fiskin, men teir gramdu seg um, at tað gjørdi, at teir ikki fingu fiskað so nógv, sum teir vildu, tí teir megnaðu ikki at turka alt. Dahlerup helt tað vera „fuldkommen naturligt og billigt“, at norðoyingar eisini sluppu at avreiða ráfisk, og frá Jacobæusi fekk hann at vita, at tað bar til at virka fisk úr øllum landinum í Havn, um fiskurin varð saltaður, har hann varð avreiddur, og Jacobæus var eisini til reiðar at virka allan tann fisk, sum varð avreiddur um veturin.

Handilsforvaltarin hevði ábyrgdina av handlinum, so amtmaðurin vendi sær 20. august 1849 til hansara við einum uppskoti um, at fiskur skuldi kunna avreiðast í Havn og við úthandlarnar frá 1. november. Hann vildi tí hava at vita, hvat handilsforvaltarin helt um hetta hugskotið, og serliga vildi hann hava hann at siga, um fólkini við úthandlarnar vóru før fyri at taka ímóti, viga og salta fiskin, um pláss var at goyma saltaða fiskin við úthandlarnar, og um nóg mikið

356 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 342. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 9. august 1849.



*Dahlerup sá skjótt, at stórir ótroyttir møguleikar vóru fyri at menna fiskivinnuna í Norðoyggjum, tí norðoyingar fiskaðu meir enn aðrir føroyingar, men teir høvdu ongan møguleika at avreiða ráfisk. (Mynd: Tjóðsavnið 0SK043F147)*

av salti, vektum og aðrari útgerð var í úthandlunum. Amtmaðurin roknaði við at fáa skjótt svar, tí hetta var eitt tiltak, „Hvorefter Beboerne i høi Grad længer,“ og hann roknaði eisini við, at hetta átak kundi fáa stóran týdning[357].

Handilsforvaltarin svaraði longu dagin eftir, men júst hvat hann segði, vita vit ikki, tí tíverri er sjálvt svarið ikki at finna undir tí journalnummarinum, har tað eigur at liggja[358]. Svarið var í øllum førum ikki so negativt, at tað steðgaði ætlanunum hjá amtmanninum, tí tíðliga í september sendi hann hugskotið víðari til Innanríkisráðið. Í skrivinum greiddi hann frá, at tá ið hann kom til Føroya í juli var einki gjørt fyri at taka ímóti fiski úti um landið, sjálvt um tað var eitt ynski hjá føroyingum. Hann var eftir „mangfoldige Andragender desangaaende“ vorðin vísur í, at hetta var eitt tiltrongt átak fyri Føroyar. Hann hugsaði serliga um oyggjarnar longst burtur frá býnum, tí eingin fiskur var komin úr Norðoyggjum, har besta fiskaríið var, og heldur eingin fiskur var komin úr Suðuroynni, tí tað bar ikki til at flyta ráfisk haðani til Havnar. „Naar man nu ved, at der ved Norderøerne fanges langt flere Fisk end her ved Øerne, er det indlysende, at det

357 TSS. Færø Amt. Kopibók AA, bræv nr. 606. Bræv til handilsforvaltaran dagfest 24. august 1849.

358 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 974. Bræv frá handilsforvaltaranum dagfest 25. august 1849.

sikkert maatte være Hensigtsmæssigt, at disse Øers Beboere ogsaa bleve satte istand til at kunne komme til at aflevere deres Raafisk.“

Í Norðoyggjum vóru fólk framvegis noydd til at selja turran fisk, eins og havnarfólk gjørdu fyrr, men tey gramdu seg um, at tað forðaði teimum í at fiska so nógv, sum tey vóru før fyri, tí tey megnaðu ikki at turka meira enn eitt vist. Tí var tað fyri Dahlerup natúrligt, at norðoyingar fingu líka góðan møguleika at avreiða, sum streymoyingar høvdu. Jacobæus helt seg vera føran fyri at virka allan tann fiskin, sum kundi avreiðast kring landið, og hann helt einki vera í vegin fyri, at saltaður fiskur varð fluttur við handilsjaktini til Havnar til virkingar, og hann var eisini til reiðar at virka allan tann fiskin, sum fekst vetrarmánaðirnar. Sjálvur helt Dahlerup, at tað bar til at fáa ein av handilsbetjentunum við úthandlarnar at salta fiskin, men hesum var handilsforvaltarin ikki samdur í. Amtmaðurin helt kortini fast í sínum, tí „Sagen er ... af en saadan Vigtighed for Øernes Opkomst, og Ønsket om Arrangementet saa almindeligt blandt Beboerne, at jeg ærbødigst skulde formene, at det snarest muligt bør bringes til Iværksættelse.“

Hansara uppskot var, at loyvi fekst til at taka ímóti fiski í Klaksvík og á Tvøroyri frá 1. januar 1850. Hann bað eisini um loyvi til at seta tveir mans í starv at taka ímóti fiski og at salta hann. Teir skuldu fáa 140 ríkisdálar í løn og 32 skillingar fyri hvørt skippund av saltaðum ráfiski fyri at eggja teimum til. At enda vildi Dahlerup eisini hava loyvi til at taka avgerðir um høli til fiskavirkingina. Hann bað um hesi loyvini, tí tey rættindini, hann hevði fingið við resolutiónini frá 27. februar, bara vóru galdandi árið út[359].

### *16.1.4.1 Innanríkisráðið stuðlar Handilsstjórnini*

Innanríkisráðið sendi uppskotið hjá Dahlerup víðari til Handilsstjórnina, men har var lítil hugur at taka undir við uppskotinum. Handilsstjórnin vísti á, at eitt uppskot fór at koma um klippfiskavirkingina í sambandi við ásetingina av taksti fyri komandi ár, og tí vildi hon ikki taka nakra aðra avgerð fyrr enn tá. Harumframt helt Handilsstjórnin, at handilin skuldi vera væl fyrireikaður, áðrenn hann kundi fara undir at taka ímóti fiski frá 1. januar í sínum handlum. Sum var, var handilin als ikki fyrireikaður upp á at taka ímóti munandi meira fiski. Skuldi handilin megna tað, var neyðugt við størri pakkhúsrúmi í Klaksvík og á Tvøroyri og útbúnaði til virksemið, og harumframt var als ikki nóg mikið av salti í landinum til at fara undir eina víðkaða framleiðslu í januar. Tí fór tað at gerast dýrt at gera handilin kláran til at taka ímóti fiski alt árið í trimum av handlunum. Handilsstjórnin helt eisini, at tað var stór útreiðsla at skula av við 280 ríkisdálar til fiskavirkarar, og at teir skuldu fáa 32 skillingar fyri hvørt skippund av ráfiski, tá ið Jacobæus bara fekk sama dusør fyri eitt skippund av virkaðum klippfiski.

Innanríkisráðið tók grundgevingarnar hjá Handilsstjórnin til eftirtektar, og tað helt tað heldur ikki vera rætt at fara at brúka so nógvan pening upp á handilin,

---

359 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 367. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 7. september 1849.



*Amtmaðurin fylgdi væl við í, hvussu tað gekst at turka saltfiskin til klippfisk á Viðarnesi. (Mynd: Tjóðsavnið 0Sk043F011)*

nú fríhandil var væl á veg. Harumframt helt tað, at vantandi pakkhúsplássið í Klaksvík og á Tvøroyri og vantandi saltið gjørdu, at einki var at vinna í so máta henda veturin kortini. Tí vildi tað treyðugt ganga amtmanninum á møti. Hinvegin ásannaði Innanríkisráðið, at tað sambært fyriskipanini frá 27. februar 1849 var upp til amtmannin sjálvan at taka avgerðir í málum fiskivinnuni viðvíkjandi í samráð við handilsforvaltaran, so leingi sum avgerðirnar vóru innanfyri teir karmar, sum resolutiónin ásetti[360]. Myndugleikarnar hildu lítið um uppskotið hjá amtmanninum, men í síðsta enda var tað upp til hann sjálvan at taka avgerðina, tí hann hevði fingið avgerðarrættin í málum um fiskivinnu.

### *16.1.4.2 Amtmaðurin roynir at fáa Handilsstjórnina í sín part*

Hetta svarið kom helst eitt sindur tvørt fyri hjá amtmanninum, og hann gjørdi enn eina roynd at fáa Handilsstjórnina at broyta hugsan. Høvið fekk hann, tá ið Handilsstjórnin vildi hava avrit av instruxunum, sum hann hevði givið Jacobæusi at arbeiða eftir[361]. Tá ið amtmaðurin sendi avritið, greiddi hann samstundis Handilsstjórnini eitt sindur nærri frá ætlanum sínum, sum hann „ikke var saa heldig“ at fáa undirtøku fyri frá Innanríkisráðnum. Enn visti hann ikki, um tað fór at eydnast honum at fáa framt ætlanina á annan hátt, og millum linjurnar tykist tað sum, at tað var mótstøða frá handilsforvaltaranum, sum órógvaði. Hann vildi í hvussu er hava Handilsstjórnina at greiða sær frá, hvussu nógv

360 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 1078. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 13. oktober 1849.

361 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 1083. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 17. oktober 1849.

prosent handilsforvaltarin fekk av tí turra fiskinum, sum hann keypti til handilin, og aftan fyri tann spurningin lá helst gamli illgrunin um, at handilsforvaltarin sjálvur hevði stóra inntøku av turra fiskinum, og hon gjørdi , at hann als ikki var áhugaður í, at fiskaframleiðslan broyttist til klippfiskaframleiðslu. Harumframt vildi hann hava at vita, hvussu føroyski klippfiskurin var samanborið við tann íslendska og tann norska, og hvør prísur var á hesum fiskinum ymsa staðni[362].

Handilsstjórnin hevði helst ikki serliga góðan hug til at ganga amtmanninum á møti við uppskoti sínum, og tað kann vera ein orsøk til, at hon ikki svaraði aftur fyrr enn í mars 1850. Tá kundi hon aftur fyri geva eina gjølliga frágreiðing um, hvussu gingist hevði árið fyri, og brúk var eisini fyri tí, tí hugsanin hjá Handilsstjórnini var tætt knýtt at handilsliga úrslitinum.

Handilsstjórnin hevði ongan hug til at finnast at handilsforvaltaranum og svaraði stutt upp á spurningin um hann, at hann fekk ta yvirvektina av turra fiskinum, sum §5 í fyriskipanini frá 13. august 1790 ásetti. Hinvegin var Handilsstjórnin ikki nøgd við fiskin úr Føroyum. Hon hevði frá kønum detailhandlarum fingið at vita, at fiskurin frá náttúrunnar hond var betri enn tann íslendski, serliga tí hann tyktist at vera feitari, men viðgerðin av fiskinum „lader meget tilbage at ønske". Tá ið fiskurin kom til Keypmannahavnar, var hann ofta so saltbrendur og í heila tikið ikki so væl viðgjørdur, sum henda vøran kravdi. Ofta var fiskurin eisini vátur ella fuktigur, og tað var ein feilur, sum bestu íslendsku handilsmenninir megnaðu at sleppa undan.

Orsøkin til hesar trupulleikar var sambært Handilsstjórnini ikki, at fiskurin var illa viðgjørdur. Trupulleikin var føroyska veðurlagið. Handilin hevði áhaldandi víst á henda trupulleika, og nú hevði veðrið verið uppaftur verri enn fyrr til klippfiskaframleiðslu. Handilsstjórnin vísti á, at tey 148 skippundini, sum skonnartin „Neptunus" hevði við á síni síðstu ferð, vóru so óvanliga vát, at skiparin hevði viðmerkt á konnosomentið, at hann hevði tikið ímóti fiskinum í hesum standinum, so at hann ikki skuldi fáa trupulleikar av tí seinni.

At fiskurin var so vátur, var óvanligt, og fiskurin fekk eisini vánaligan prís á uppboðssøluni hjá handlinum 8. mars 1850. Norskur fiskur var ikki á marknaðinum í Keypmannahavn árið fyri, men sum heild var góðskan á føroyska fiskinum vánaligari enn á tí íslendska. Prísurin á íslendska fiskinum hevði ligið millum 14 og 20½ ríkisdála fyri skippundið, meðan føroyski fiskurin á uppboðssølum 31. august og 2. november í miðal hevði verið 16,37 ríkisdálar fyri stóran klippfisk, 10,80 fyri smærri klippfisk og 18,37 fyri klipplongu. 8. mars høvdu miðalprísirnir verið uppaftur lægri, og metti prísurin á tí, sum enn var óselt, var settur til 511,41 ríkisdálar.

Samanlagt fór inntøkan av teimum 297 skippundunum av klippfiski, sum vórðu útskipað í 1849, at gerast 3756 ríkisdálar ella 12,58 ríkisdálar í miðal. Av hesi inntøkuni skuldu dragast 2047,44 ríkisdálar, sum tað kostaði at keypa

362 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 397. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 21. november 1849.

ráfiskin, og 1427,45 í framleiðslukostnaði. Sostatt gav sjálv framleiðslan bara 281,07 ríkisdálar í yvirskoti, men umleið 700 ríkisdálar komu afturat í útreiðslu til frakt, pakkhúsleigu, trygging og annað, so samanlagt fór klippfiskavirksemið í 1849 at geva handlinum eitt undirskot upp á umleið 400 ríkisdálar. Hesin roknskapur gjørdi, at Handilsstjórnin kom til hesa niðurstøðu:

> „Ligesom Udfaldet af denne Trafik i de foregaaende Aar stedse har bragt Handelen directe Tab, saaledes har, efter hvad foran er anført, Indhandlingen af Raafisk og sammes Virkning til Klipfisk i afvigte Aar ogsaa medført Tab, uagtet Fiskeberederens Løn er nedsat og den betydelige Overvægt - 1620 lispund 6 pund - er tilfalden Handelen.
>
> Af det saaledes i det hele tilstedeværende Resultat, kunne man komme til den slutning, at det færøske Klima i Reglen ikke egner sig til at frembringe Klipfisk af god eller bedste Qvalitet, og at der i det hele taget ei er Anledning for den Kongelige Handel til at giøre yderligere Foranstaltning til Udvidelse af den omhandlede Trafik.“[363]

Enn eitt ár við negativum úrsliti og vánalig góðska gjørdu, at Handilsstjórnin ongan áhuga hevði í at víðka um møguleikarnar við klippfiskaframleiðsluni. Tvørturímóti virkaði tað sum, at Handilsstjórnin royndi at fara aftur í tíð við at siga, at føroyska veðurlagið var ein forðing fyri framleiðslu av klippfiski, og tað var kanska ein ávaring um, at Handilsstjórnin skjótt fór at mæla til heilt at steðga við klippfiskaframleiðsluni í Føroyum. Í hvussu er kundi amtmaðurin ikki rokna við, at hann frá Handilsstjórnini fór at fáa stórvegis stuðul í strembanini eftir at menna fiskivinnuna.

#### *16.1.4.3 Amtmaðurin tryggjar, at virksemið heldur fram í 1850*

Tá ið Dahlerup amtmaður fekk svarið frá Handilsstjórnini, var hann langt síðani farin í gongd við at fyrireika ymisk átøk at menna fiskivinnuna í 1850, og hann fekk 6. mars at vita frá Innanríkisráðnum, at hann í 1850 varðveitti somu heimildir klippfiskavirkingini viðvíkjandi, sum hann fekk 27. februar 1849[364]. Fyrsta uppgávan var at seta Jacobæus í starv í enn eitt ár, og tað gav Innanríkisráðið játtandi svar uppá 3. oktober 1849[365].

Hugburðurin hjá Handilsstjórnini gjørdi, at einki kom burtur úr ætlanunum um at taka ímóti fiski í Havn frá 1. november 1849 og í Klaksvík og á Tvøroyri frá 1. januar 1850, men í februarmánaði spurdi amtmaðurin seg fyri hjá handilsforvaltaranum og Jacobæusi, hvat teir hildu um at byrja móttøkuna 1. mars. Nolsøe handilsforvaltari helt, at fyri havnarfólk og møguliga onnur, sum búðu

---

363 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 93. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 16. mars 1850.

364 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 73. Bræv frá Innanríkisráðnum, dagfest 6. mars 1850.

365 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 1060. Bræv fram Innanríkisráðnum dagfest 3. oktober 1849.



*Handilsstjórnin vildi í 1849 ikki víðka um møguleikarnar í fiskivinnuni, men amtmaðurin fekk kortini skipað so fyri, at ráfiskamóttøkan í 1850 kundi byrja 1. mars. (Mynd: Tjóðsavnið 3350F02633)*

nær við Havnina og høvdu trong kor, var tað ynskiligt at byrja móttøkuna so tíðliga, og fyri góðskuna á klippfiskinum var tað eisini ynskiligt, at móttøkan byrjaði tíðliga á vári heldur enn at halda fram út á heystið, tí royndirnar høvdu víst, at tað var torført at virka klippfisk eftir miðjan augustmánað. Jacobæus var samdur, og hann vissaði um, at hann fór at kunna framleiða líka góðan klippfisk burtur úr hesum ráfiskinum, sum hann hevði framleitt higartil[366]. Tí er helst lítið at ivast í, at móttøkan av ráfiski í Álakeri byrjaði 1. mars 1850.

Í svari sínum vísti handilsforvaltarin, at hann framvegis ikki hevði fult álit á Jacobæusi. Hann helt, at tað skuldi áleggjast Jacobæusi at fylgja instruxinum, og at tað var ófrávíkiligt krav, at fiskur undir ¾ alin varð saltaður, turkaður og stáplaður púra fyri seg, so hann ikki varð blandaður við størri fisk og longu, og at fiskur hjá øðrum, eisini fiskavirkaranum sjálvum, var hildin fyri seg og ikki kom nær at fiskinum hjá handlinum. At enda vildi hann eisini hava, at fiskavirkarin undir ongum umstøðum tók salt av tí, sum var ætlað til virkingina, til egna nýtslu, tí saltið skuldi bara brúkast til virksemið hjá handlinum[367].

### *16.1.4.4 Keypa bíligari salt í Hetlandi*

Økta framleiðslan gjørdi, at nógv meira salt skuldi flytast til Føroya, enn vanligt

366 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T. Hetta brævið liggur millum ójournaliserað brøv í eini mappu fyri seg. Bræv frá Jacobæus dagfest í Havn 23. februar 1850.

367 TSS. Færø Amt. Færø Amts Journal Litra T. Hetta brævið liggur millum ójournaliserað brøv í eini mappu fyri seg. Bræv frá handilsforvaltaranum dagfest í Havn 23. februar 1850.

hevði verið. Eftirspurningurin eftir salti vísti seg skjótt at gerast ein trupulleiki, tí viðhvørt var ov lítið av salti í handlinum, og undir øllum umstøðum var saltið alt ov dýrt. Amtmaðurin vildi ikki hava, at hesin trupulleikin forðaði fyri menningini av klippfiskaframleiðsluni, og tí avgjørdi hann í januar 1850 at senda jaktina „Fortunu" til Hetlands við boðum um, at teir skuldu keypa salt heim við. Saltið fingu teir frá Hay í Lerwich, sum sjálvur virkaði fisk, men sjálvt um tað tí var keypt frá einum millumhandlara, so var tað so bilígt í mun til søluprísin í handlinum í Havn, at vinningurin var meir enn 50 %.

At loysa trupulleikan við vantandi salti vísti seg tí at lata upp fyri einum møguleika fyri at fáa bíligari salt, og bíligari salt kundi hava við sær, at útreiðslurnar av aðrari framleiðslu minkaðu so mikið, at hon kundi fara at loysa seg. Tað gav amtmanninum høvi at spyrja, um tað ikki bar til at seta søluprísin á salti niður í handlinum, tí saltið var „uundværlig for disse Øers vigtigste Erhvervskilde". Hann hevði roynt at fingið føroyingar at gera nakað við ta nógvu sildina, sum javnan var at síggja um summarið, men svarið var altíð, at saltið var ov dýrt til at gera nakað við tað. Sjálvt um amtmaðurin bara hevði verið í Føroyum í nakrar mánaðir, so kundi hann longu siga, at „man behøver kun kort Tid at have opholdt sig her paa Øerne, for at lære at kjende den sørgelige deprimerende Indflydelse, som Monopolet har paa Beboernes Vindskibelighed." Tí mælti hann til at seta prísin á salti so langt niður, at tað í hvussu er ikki var prísurin, sum fekk føroyingar at halda seg aftur í at nýta teir fyrimunir, sum fiskivinnan kundi geva teimum[368]. Hetta ynskið um bíligari salt var tí bæði eitt átak til frama fyri nýggjari vinnu, men samstundis eisini eitt álop á Einahandilin.

Innanríkisráðið spurdi Handilsstjórnina, og hon greiddi frá, at salt eins og aðrar vørur til Føroya vóru keyptar ótollaðar, og harumframt vóru bara 20 % løgd oman á innkeypsprísin á vørum, sum skuldu nýtast í fiskivinnuni, sum í árinum svaraði til 39 skilllingar upp á tunnuna. Við hesum vinningi megnaði handilin ikki at gjalda fyri fraktina, og tí gav saltsølan handlinum undirskot. Takstprísurin á salti var 2 ríkisdálar og 43 skillingar fyri tunnuna, og tað var 1 ríkisdála og 53 skillingar lægri enn tað, sum brúkarar í Keypmannahavn guldu fyri salt.

Amtmaðurin hevði skotið upp at bíleggja saltið beinleiðis úr Onglandi, men heldur ikki tað helt Handilsstjórnin vera eitt gott hugskot, tí mongdirnar vóru so smáar. Hon vísti á, at útflutningurin til Føroya av Liverpool-salti hevði verið 180 tunnur í 1845, 170 í 1846, 80 í 1847, 150 í 1848 og 420 í 1849. Hesar mongdir góvu ikki grundarlag fyri beinleiðis flutningi millum Ongland og Føroyar, m.a. tí at eitt slíkt fraktskip ongan farm fekk tikið við sær hinvegin aftur. Í 1850 ætlaði Handilsstjórnin at senda 850 tunnur til Føroya umframt tær 241½ tunnurnar, ið vóru komnar úr Hetlandi. Handilsstjórnin væntaði ikki, at alt hetta saltið fór at verða nýtt í árinum, men um so var, so skuldi hon fara at kanna, um tað bar

368 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 435. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 6. mars 1850.

til at fáa ein fyrimun av at senda salt beinleiðis til Føroya. Sum nú var, kundi Handilsstjórnin tó ikki mæla til at lækka prísin[369].

Innanríkisráðið takkaði fyri svarið, men mælti til, at Handilsstjórnin sendi jaktina „Fortunu" til Hetlands 2 ferðir komandi vetur eftir salti, og um tað ikki var nóg mikið til tørvin, átti Handilsstjórnin eisini at umhugsað at sent eitt skip til Hetlands um summarið. Á tann hátt vónaði málaráðið, at Handilsstjórnin megnaði at seta prísin á salti í Føroyum nakað niður[370]. Amtmaðurin fekk boðini um hetta sama dag, sum tey vóru send Handilsstjórnini[371], og hann varð helst glaður fyri boðini um, at Innanríkisráðið í hesum málinum valdi at fylgja hansara tilmæli heldur enn Handilsstjórnini. Vøksturin í saltinnflutninginum er eitt greitt tekin um, at framleiðslan av klippfiski øktist, men teir túrarnir, sum „Fortuna" gjørdi millum Hetland og Føroyar um veturin, fingu eisini stóran týdning á annan hátt, tí teir lótu upp ein nýggjan møguleika fyri samskifti millum Føroyar og útheimin.

### *16.1.4.5 Ráfiskamóttøka í Klaksvík 1850*

Amtmaðurin hevði heimild til at víðka um møguleikarnar at taka ímóti ráfiski, og tað fór hann undir tíðliga í 1850. Árið fyri hevði hann staðfest, at bestu fiskileiðirnar vóru norðanfyri, og at besti møguleikin fyri at økja um klippfiskanøgdirnar var at fáa norðoyingar at avreiða fisk til handilin. Hann avgjørdi tí at seta gongd á ráfiskamóttøku við úthandilin í Klaksvík, og hann setti 5. mars David Davidsen í starv at taka sær av hesum arbeiðinum har[372]. Handilsforvaltarin var helst ikki so fegin um hetta átakið, tí tað gingu meir enn tvær vikur, áðrenn hann 21. mars boðaði faktorinum í Klaksvík, J.D. Nolsøe, frá, at handilin har skuldi fara undir at taka ímóti ráfiski 1. apríl.

Faktorurin væntaði, at hesin nýggi møguleikin fór at fáa heilt góða undirtøku í Norðoyggjum, og tí var ikki ósannlíkt, at upp til 50 fulllastaðir bátar kundu koma at landa dagliga, tá ið veðrið var til vildar. Tað hevði verið frálíkt, um umstøður høvdu verið til at taka ímóti slíkari mongd, men soleiðis var støðan ikki, og tí skeyt faktorurin upp at seta avmarkingar á. Hansara uppskot var, at avreiðingarmøguleikin varð avmarkaður til bátar í Klaksvík og hinumegin eiðið í fyrsta umfari, tí hesir bátar fingu ikki so nógv eyka stríð av at taka fiskin heim við sær, um tað av onkrari orsøk ikki bar handlinum til at taka ímóti fiskinum.

Spurningurin var so eisini, um nakað kundi gerast fyri at bøta um møguleikarnar, men har vóru boðini eitt sindur ógreið úr Klaksvík. Handilsforvaltarin

---

369 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 396. Bræv frá Handilsstjórnini til Innanríkisráðið dagfest 16. juli 1850. Her í avriti sent amtmanninum.

370 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, nr. 396. Bræv frá Innanríkisráðnum til Handilsstjórnina dagfest 23. september 1850. Her í avriti sent amtmanninum.

371 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 396. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 23. september 1850.

372 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 173. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 14. mai 1850.



*Dahlerup amtmaður tók stig til, at Einahandilin í Klaksvík í 1850 tók ímóti ráfiski. Fiskurin varð saltaður í Klaksvík og síðani førdur til Havnar at virkast til klippfisk. (Mynd: Tjóðsavnið 5207F89.046)*

hevði mælt til, at nýggi pakkhúskjallarin skuldi nýtast til fiskamóttøkuna, men tað dámdi faktorinum einki. Hann mælti heldur til at brúka eitt gróthús, har skaddar tunnur og bøkjaraverkstaður vóru, og ein orsøk til tað var, at tað var bøkjarin, sum skuldi taka sær av fiskamóttøkuni og saltingini. Í onkrum av neystunum á Biskupsstøð fekst helst pláss fyri tunnunum, og haðani var lætt at fáa fatur í teimum, tá ið brúk var fyri teimum. Sjálvt um faktorurin á henda hátt royndi at flyta fiskamóttøkuna í gomul høli, har pláss var tøkt, heldur enn at nýta nýggjastu hølini, so dugdi hann ikki at síggja, at nakað var í vegin fyri, at saltaði fiskurin í Klaksvík gjørdist líka góður sum tann í Havn, um hann varð fluttur við jaktini „Fortunu" innpakkaður í føt av furutræi[373]. Faktorurin var tvítýddur í sínum boðum, og torført er at avgera, um hann var fyri ella ímóti nýggja átakinum.

Seinni kom faktorurin við einum hugskoti um at umbyggja eitt torvhús, so at ein ráfiskakjallari kundi vera niðri undir tí, og torvið uppiá. Húsið var 12 alin langt og 6 alin breitt, men umbygt kundi tað gerast 18 alin langt og 8 breitt. Trupulleikin var, at tað fór at kosta 250 ríkisdálar[374]. Amtmaðurin spurdi handilsforvaltaran, hvat hann helt um hugskotið, og í svarinum frá handilsforvaltaranum kom greitt til sjóndar, at hansara viðurskifti við undanfarna

373 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 98. Bræv frá J.D. Nolsøe faktori í Klaksvík dagfest 29. mars 1850.

374 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 144a. Bræv frá J.D. Nolsøe, dagfest 18. apríl 1850.

amtmannin ikki altíð vóru so góð. Hann vísti nevniliga á, at tað vóru Pløyen amtmaður og Daniel J. Joensen, sum stóð fyri arbeiðinum, sum høvdu avgjørt at byggja hetta húsið soleiðis uttan at spyrja handilsforvaltaran fyrst. Tí kom húsið at standa á einum óhóskandi stað, og tað var ikki so væl innrættað, sum tað hevði kunnað verið. Men hann kundi so undir ongum umstøðum mæla til nakra umvæling, tí í brævi dagfest 16. mars 1850 hevði hann fingið at vita frá Handilsstjórnini, at ongar størri umvælingar ella innrættingar skuldu gerast, fyrr enn spurningurin um fríhandilin var avgjørdur[375].

Handilsstjórnin var púra avgjørd í, at hon ikki fór at brúka meira pening upp á Einahandilin í Føroyum, meðan handilin var til politiska viðgerð, og lítið man vera at ivast í, at hon var uppaftur meira avgjørd um ikki at brúka meira pening upp á klippfiskaframleiðsluna, sum á hvørjum ári gav handlinum undirskot. Tí er heldur ikki so undarligt, at Handilsstjórnin ikki var fegin um hetta átakið hjá amtmanninum. Hon ásannaði kortini, at amtmaðurin hevði heimild til hetta sambært fyriskipan frá 27. februar 1849 og 4. mars 1850, og tí hevði hon ikki so nógvar møguleikar at leggja forðingar í vegin fyri hesum átakinum at menna fiskivinnumøguleikarnar.

Ein møguleika fekk Handilsstjórnin kortini, tá ið handilsforvaltarin boðaði frá, at trupulleikar kundu vera av at føra fiskin til Havnar við jaktini hjá handlinum „Fortunu“. Hetta var ein kærkomin trupulleikin, og Handilsstjórnin valdi at nýta hann til fulnar. Handilsforvaltarin greiddi frá, at tað kundi gerast óheppið at flyta saltaðan fisk og vanliga handilsvøru við sama fari, og vandi var eisini fyri, at góðskan á fiskinum versnaði. Í fyrstu umfari skrivaði Handilsstjórnin til amtmannin, at teir vónaðu, at hann fór at taka atlit at hesum vansunum[376].

Tá ið Dahlerup fekk hesi boðini, skilti hann beinan vegin, hvussu álvarsamt tað kundi gerast, at Handilsstjórnin hevði fingið henda vansan at hanga seg í. Amtmaðurin vardi seg við at siga, at handilsforvaltarin einki hevði nevnt um henda vansan, tá ið hann ráðførdi seg við hann, áðrenn avgerð varð tikin um at taka ímóti ráfiski í Klaksvík. Tá ið hann skrivaði til Handilsstjórnina 1. juni, hevði jaktin ført tvær lastir av saltaðum fiski til Havnar, uttan at nakar vansi hevði verið við tí, og uttan at fiskurin var versnaður á ferðini. Harumframt visti hann at siga, at uppaftur meiri fiskur kundi verið fingin úr Klaksvík, um ikki forvaltarin hevði gloymt at syrgt fyri, at nóg mikið av salti var í Klaksvík. Saltmangulin hevði gjørt, at teir noyddust at gevast at keypa ráfisk, fáar dagar eftir at gongd var komin á, og virksemið lá stilt í eina tíð.

Fyri amtmannin var hetta vantandi salti ein roynd hjá handilsforvaltaranum at forkoma fiskamóttøkuni í Klaksvík, og tað sama helt hann um avgerðina hjá Handilsstjórnini at senda handilsskonnartina „Havfruen“ til Klaksvíkar, tí

375 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 144. Bræv frá Nolsøe handilsforvaltara, dagfest 24. apríl 1850.

376 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 173. Bræv frá Handilsstjórnini, dagfest 14. mai 1850.

brúk fór at verða fyri at senda jaktina „Fortunu“ eftir fiski eina ella tvær ferðir afturat í árinum. Tað hevði tí verið skilabetri, um skonnartin fór til Suðuroyar ella Vestmanna[377].

Sjálvt um amtmaðurin mótmælti royndunum at seta forðingar í vegin fyri fiskamóttøkuni, so helt handilsforvaltarin kortini á at gera fiskaflutningin ómøguligan. Síðst í juni hevði hann fingið bæði Andreasen skipara á „Fortunu“ og Seistrup skipara á „Hector“ at vátta, at jaktin var vorðin so skitin av fiskaflutninginum, at tað ikki var ráðiligt at flyta kornvørur við henni, sjálvt tá vørurnar vóru í sekkjum. Harumframt vildi handilsforvaltarin vera við, at jaktin ikki megnaði at røkja sín vanliga flutning av timburi til úthandilin á Tvøroyri og flutningin av turrum fiski úr Klaksvík til Havnar, tí saltfiskaflutningurin fór við so nógvari tíð. Ein avleiðing var, at 1400 lispund av turrum fiski framvegis lógu í Klaksvík og tí ikki kundu flytast til Danmarkar við „Hector“, sum ætlanin hevði verið. Hesar grundgevingar vóru nóg góðar til, at Handilsstjórnin avgjørdi, at jaktin ikki longur skuldi nýtast til at flyta saltaðan fisk úr Klaksvík til Havnar. Handilsstjórnin kravdi, at amtmaðurin tók sína avgerð um at nýta jaktini til henda flutning aftur, men annars var tað upp til hann sjálvan, hvussu hann so flutti fiskin til Havnar[378].

Amtmaðurin kannaði grundgevingarnar hjá handilsforvaltarnum, og frá Andreasen skipara fekk hann at vita, at hann hevði ikki klagað um flutningin av fiski til Havnar. Hann hevði einaferð hetta summarið svarað handilsforvaltaranum, at hann ikki kundi føra leyst korn í lastini, tí fiskurin hevði gjørt hana váta. Sjálvt um brettir og mottur vóru í lastini, slapst ikki undan, at nakað av korni kom í samband við garneringina, og tá var vandi fyri, at tað spiltist. Hann kundi ikki nokta, at fiskaflutningur altíð dálkaði nakað, men tað bar altíð til at vaska lastina við feskum vatni, og so lata hana torna í ein dag. Tá skuldi ikki verið nakað í vegin fyri at flutt korn í sekkjum, um tað ikki lá ov leingi í lastini[379].

Handilsstjórnini vildi kortini ikki broyta sína støðu, og tí var stórur vandi fyri, at ráfiskamóttøkan í Klaksvík bara fór at verða hetta eina árið. Amtmaðurin kannaði ymiskar aðrar flutningsmøguleikar. Fyrsta uppskotið var at fáa nólsoyingar at flyta fiskin við skipinum „Haabet“ ella at nýta „Ebenezer“, sum handilsforvaltarin sjálvur átti. Amtmaðurin spurdi handilsforvaltaran, hvat hann helt um hetta, og svarið var, at eitt slíkt skip fór at krevja tríggjar mans umframt ein skipara, tí so arbeiðskrevjandi var arbeiðið at lasta og lossa skipið. Ein dagløn til hesar menn kundi ásetast til 4 markar, og skiparin skuldi hava 1 ríkisdála í løn um dagin. Harumframt skuldi leigan av skipinum gjaldast, og hon fór at kosta umleið tað sama sum hýran hjá manningini. Sjálvur helt handilsforvaltarin, at nólsoyarskipið skuldi nýtast til henda flutning, tí teir høvdu tørv á inntøkum

377 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 477. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 1. juni 1850.

378 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 323. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 16. juli 1850.

379 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 323. Bræv frá Andreasen skipara dagfest 21. november 1850.



*Nolsøe handilsforvaltari og Handilsstjórnin fingu lagt so nógvar forðingar fyri nýggja virkseminum í Klaksvík, at ongin ráfiskamóttøka var har í 1851. (Mynd: Tjóðsavnið 8295F086)*

til at kunna avdraga skuldina[380]. Einki kom burtur úr hesi ætlanini at hýra eitt skip, og orsøkin var helst, at handilin noktaði fyri at nýta meira pening upp á hesa ætlanina.

Skuldi fiskamóttøkan í Klaksvík halda fram, skuldi ein møguleiki finnast at flyta fiskin til Havnar, uttan at tað kostaði handlinum nakað. Hetta var ein torførur knútur at loysa, men tíðliga í 1851 hevði amtmaðurin funnið eitt hugskot til, hvussu málið kundi loysast. Hann helt, at tað átti at borið til hjá teimum útróðrarmonnunum, sum fingu ein fyrimun av, at ráfiskamóttøka var í Klaksvík, at skipa seg soleiðis, at teir kundu skiftast um at flyta fiskin til Havnar við bátum sínum. 1. mars vendi amtmaðurin sær til Norðoya sýslumann og bað hann kanna, um tað bar til at fáa klaksvíkingar at føra saltfiskin til Havnar. Talan var um at fylla eitt áttamannafar fjúrtanda hvønn dag. Um teir skiftust um henda túrin, so fór byrðan ikki at vera nakað at tosa um, men um áhugi ikki var fyri tí, var eingin møguleiki fyri at halda fram við ráfiskamóttøkuni[381].

Sýslumaðurin spurdi norðingar, men sjálvt um meirilutin av teimum vildi varðveita møguleikan at avreiða ráfisk í Klaksvík, vildi eingin átaka sær uppgávuna

380 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 323. Bræv frá handilsforvaltaranum dagfest 12. november 1850.

381 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 665. Bræv til Matras sýslumann dagfest 1. mars 1851.

at flyta fiskin til Havnar ókeypis[382]. Tá amtmaðurin fekk hetta svarið, gav hann upp, og Kongligi einahandilin tók ongantíð aftur ímóti ráfiski í Klaksvík.

Tá ið møguleikin at landa ráfisk í Klaksvík var horvin, ásannaðu fleiri norðingar, at teir høvdu mist ein góðan vinnumøguleika, og at tað tí helst hevði verið skeivt at noktað fyri at flyta saltfiskin til Havnar. Teir fingu tann læraralærda Peter Olsen (Hansen 1981: 93) at orða eitt skriv fyri seg, sum var stílað til Jacobæus, har teir bóðu um at fáa møguleikan at avreiða í Klaksvík aftur[383]. Í skrivinum vístu teir á fyrimunirnar, sum tey fátøku í økinum, sum ikki áttu so frægt av jørð, at tey kundu seta fótin á hana, høvdu fingið av ráfiskahandlinum. Hesi fólk grundaðu meginpartin av sínari tilveru á „Søprodukterne", og tí var tað „beklageligt", at tey ikki fingu so góða nyttu av fiskinum, sum tey kundu fingið. Hetta kom serliga illa við nú, tá ið tað

> i flere Aar har været saa knappe Tider, at mange har været nødsagede til at spise Fisken ligesom de have faaet den i steden for at de kunde afleveret den Raa fik de baade Korn og Brød for den, men det vil da være Forskjel paa at spise Fisk og nysnævnte Ligesom naar den skal tørres skal man gjøre sig Regning paa at tabe ½ maaske 1 skilling paa hvert pund eller ⅓ af Fisken som oftest under Tørringen i følge af at blive Rast og Slibet som man kalder det at den maa endelig En ja maaske To gange udvadskest og derved tabe en betydelig Vægt ligesom ogsaa derved bliver den ofte mager eller Skindfisk. Altsaa ved at tørre Fisken taber man baade Tid og Skilling.

Norðingarnir ásannaðu, at tað kostaði handlinum nakað at flyta fiskin, men um atlit skuldu takast til tann ríka ella tann fátæka, „maa jeg spørge hvem beder er istand til at lide Tabet Handelen eller Landets fattige". Munur var á, um ein maður misti 1 ríkisdála av 100 enn um ein maður misti 1 ríkisdála av 5, og soleiðis sóu teir upp á støðuna viðvíkjandi fiskamóttøku í Klaksvík. Vónin var, at fleiri norðingar fóru at skriva undir, og at fiskaframleiðarin fór at gera sítt til, at ráfiskur aftur kundi landast í Norðoyggjum.

Umframt Petur skrivaðu 14 aðrar klaksvíkingar undir áheitanina. Teir vóru Christopher F. Olsen, Christian Thomasen, Ole J. Fredriksen, Joen Olesen, Johannes Joensen, Samuel Thomasen, Thomas Jacobsen, Johan Joensen, Ole Albertsen, Ole Joensen, Just Hansen, Heine Hansen, Joen Heinesen, Elias Pedersen[384].

Henda áheitanin er eitt gott dømi um, hvørja ávirkan tað hevði, tá ið nýggir møguleikar vórðu skaptir við amtmanninum á odda. Ein av orsøkunum til, at amtmaðurin tók stig til at taka ímóti ráfiski í Klaksvík var, at hann fekk fleiri

382 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 665. Bræv frá Matras sýslumanni dagfest 5. apríl 1851.

383 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1343. Bræv frá Jacobæus dagfest 30. juli 1852.

384 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1343. Bræv frá Peder Olsen og øðrum klaksvíkingum dagfest í Gerðum 12. mars 1852.



*Í 1852 ásannaðu 15 klaksvíkingar, at teir við ráfiskamóttøkuni høvdu mist ein gyltan møguleika at bøta um umstøður sínar.*

áheitanir um tað frá fólki í økinum. Hugurin at royna nýggjar leiðir var har, og útróðrarmenn tóku væl ímóti møguleikanum, men eftir bara einum ári var hugurin til at stríðast fyri at varðveita møguleikan ikki vorðin so stórur, at undirtøka fekst fyri at rógva saltaða fiskin ókeypis til Havnar. Tá ið møguleikin so hvarv aftur, ásannaðu fleiri av teimum, sum í aðra mátar vóru sosialt ringast fyri, hvussu stórur hesin fyrimunurin, sum var gloppin teimum av hondum, í veruleikanum var. Tá var ov seint at fáa gongd aftur á virksemið hjá Kongliga handlinum í Klaksvík, men ein tørvur var skaptur, og hann gjørdist skjótt grundarlag undir privatum vinnuvirksemi.

### 16.1.5 Handilsstjórnin vil steðga klippfiskaframleiðsluni

Tað eydnaðist Handilsstjórnini at gera ein enda á royndini at taka ímóti ráfiski í Klaksvík, og harvið tyktist tað eisini at eydnast henni at forða fyri vøkstri í klippfiskaframleiðsluni, og Handilsstjórnin vísti týðiliga, at hon helst sá, at henda nýggja fiskavirkingin so spakuliga hvarv aftur.

### *16.1.5.1 Handilsstjónin ger árið 1850 upp*

Næsta høvið at gera vart við hesa støðuna kom, tá ið Handilsstjórnin gjørdi roknskap fyri árið 1850. Hennara niðurstøða um árið var, at 10.840 lispund av klippfiski vóru komin til Danmarkar, sum annaðhvørt var seldur ella varð mettur at fara at verða seldur fyri tilsamans 7.563 ríkisdálar. Hetta var úrtøkan av teimum 24.787 lispundunum av ráfiski, sum vóru avreidd. Í Havn var ráfiskur keyptur fyri 2.547,62 ríkisdálar, og í Klaksvík var fiskur keyptur fyri 1.358,44 ríkisdálar. Framleiðslan hevði í Havn kostað 758,24 ríkisdálar og í Klaksvík 415 ríkisdálar, tá ið útreiðslurnar av „Fortunu" vóru tiknar við. Davidsen í Klaksvík fekk 64 ríkisdálar í løn, og Jacobæus fekk 400 ríkisdálar umframt 901 ríkisdálar og 30 skillingar í virkingarpeningi og dusøri. Frakt, pakkhúspláss, trygging og annað kostaðu 670 ríkisdálar, so tilsamans vóru útreiðslurnar 7.114 ríkisdálar og 73 skillingar, og tí var yvirskotið bara 448 ríkisdálar og 59 skillingar. Av hesum peningi skuldi roknast tann lutfalsligi parturin av samlaðu útreiðslum handilsins, og tað merkti, at talan neyvan var um nakað yvirskot.

Hesa støðuna samanbar Handilsstjórnin við turra fiskin. Av honum hevði handilin fingið 11.902 lispund, sum vóru seld fyri 14.160 ríkisdálar. Sambært takstprísinum høvdu útróðrarmenn fingið 8.280 ríkisdálar fyri fiskin, og um útreiðslurnar av frakt, pakkhúspláss, trygging og øðrum vórðu settar til 1.880 ríkisdálar, vóru samlaðu útreiðslurnar 10.160 ríkisdálar, og yvirskotið varð tí 4.000 ríkisdálar.

Handilsstjórnin ivaðist ikki í, at hesi úrslit vístu, at føroyingar høvdu fingið størri inntøkur við at turka fiskin heldur enn at avreiða hann sum ráfisk. Hevði ráfiskurin verið turkaður, høvdu menn fingið 4.350 ríkisdálar fyri hann heldur enn teir 3.900 ríkisdálarnar, sum ráfiskurin gav. Niðurstøðan hjá Handilsstjórnini var púra greið. Hon helt, at royndir „man gjentaget har gjort i afvigte Aar" vístu, „at Færøerne, hvad upaatvivleligen maa ligge i Climaet, ikke i Reglen kan levere god Klipfisk, uagtet Fiskens naturlige Beskaffenhed er fed og god." Hetta árið var fyrsti fiskurin, sum varð sendur niður, góður, men restin var ikki so góð, tí fiskurin var ov vátur. Tí var prísurin ofta lægri, enn hann átti at vera, og tað gjørdist torført at sleppa av við fiskin.

Hetta var sama niðurstøða, sum Handilsstjórnin so ofta fyrr hevði greitt Rentukamarinum og Innanríkisráðnum frá, og hon gjørdi, „at der ikke var Anledning til at fremkalde en forøget Tilvirkning af Klipfisk paa Færøerne, men at denne Anvendelse af Øernes Fiskeri-Udbytte burde indskrænkes til den Aarstid, hvor det er vanskeligt at virke dette Udbytte til Tørfisk." Handilsstjórnin kundi valt at steðgað allari klippfiskaframleiðsluni við at sett prísin á turrum fiski upp og prísin á ráfiski niður, og tað lá longu í kortunum, at hon fór at hækka prísin á turrum fiski.

Hon valdi kortini ikki at broyta prísin á ráfiski, tí tað fór at „standse hele Tilvirkningen af Klipfisk, og det vilde dog maaske, naar sees hen til den Interesse Amtmand Dahlerup viser dette Foretagende – der antages at have som Grund i

hans Kjendskab til Forholdene i Landet – og til, at Færingerne nu i flere Aar ere vante til paa visse Tider af Aaret strax at finde Afsætning for deres Raafisk, ikke være rigtigt paa den Maade at standse Klipfiskevirkningen." Tí varð teirra tilmæli til Innanríkisráðið at halda fram sum higartil, men teir vildu hava máláráðið at halda eyga við, um „der ikke kunde være Anledning til i Fremtiden atter at indskrænke Indhandlingen af Raafisk til den Tid af Aaret, i hvilken Fisken ikke, eller kun vanskeligen lader sig virke til Tørfisk."[385] Handilsstjórnin vildi við øðrum orðum ikki fara harðliga til verka, men hon sá helst, at tann menningin av klippfiskaframleiðsluni, sum hevði verið síðstu árini, var niðurlagað aftur.

### *16.1.5.2 Dahlerup amtmaður verjir klippfiskaframleiðsluna*

Kongur góðtók 2. mars 1851 uppskot Handilstjórnarinnar til handilstakst fyri komandi árið, og í sama viðfangi góðtók kongur, at klippfiskavirksemið skuldi halda fram á sama hátt, sum ásett í fyriskipanum frá 27. februar 1849 og 4. mars 1850. Men Innanríkisráðið var ávirkað av frágreiðingini hjá Handilsstjórnini, og tí sendi tað brot úr frágreiðingini til amtmannin og bað hann greiða nærri frá, hvussu framleiðslan fór fram í Føroyum. Í sama viðfangi sendi Innanríkisráðið eisini eina vegleiðing, sum íslendska suðuramtið hevði gjørt í 1848 við reglum um, hvussu fiskurin skuldi framleiðast. Hesar reglur áttu helst at verið fylgdar í Føroyum.

At Innanríkisráðið sendi hesa vegleiðing til Føroya, er eitt tekin um, at tað ikki var líka áhugað í at niðurlaga klippfiskaframleiðsluna aftur, sum Handilsstjórnin var, men hinvegin helt Innanríkisráðið eisini, at tað átti at verið umhugsað, um váta veðurlagið í Føroyum ikki gjørdi, at tað var meira upplagt at salta fisk í tunnur sum cabliau heldur enn at framleiða klippfisk, so tað var eitt sindur ógreitt, hvør støðan hjá ráðnum var. Umframt fiskaframleiðslu, hevði Handilsstjórnin eisini gjørt vart við, at nógv minni av føroyskari vøru varð seld til handilin í 1850 enn undanfarin ár, og samstundis var nógvur peningur tikin úr Sparikassanum. Tað bendi alt á, at vælferðin hjá føroyingum var fallandi, og eisini tað vildi máláráðið hava amtmannin at siga sína hugsan um[386].

Í svari sínum 15. apríl 1851 greiddi amtmaðurin frá, at tað var tann fiskurin, sum var avreiddur í augustmánaði, sum var ov vátur. Veðrið var ikki til vildar í september og oktober, og tí eydnaðist ikki at virka henda fiskin líka væl, áðrenn hann varð avskipaður. Avgerðin um at taka ímóti fiski í august var tikin, áðrenn Dahlerup gjørdist amtmaður, og hesin fiskur hevði kunnað blivið líka góður, um hann varð goymdur saltaður um veturin og turkaður, tá ið várið kom. Amtmaðurin vildi kortini ikki mæla til at gera tað, tí tað kostaði at ansa eftir

385 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 592. Bræv frá Handilsstjórnini til Innanríkisráðið dagfest 21. februar 1851. Her í avriti til amtmannin, sum varð sent við brævi frá Innanríkisráðnum dagfest 4. mars 1851.

386 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 592. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 4. mars 1851.



*Handilsstjórnin vildi í 1850 helst minka um klippfiskaframleiðsluna aftur, men Dahlerup amtmaður tryggjaði, at virksemið slapp at halda áfram til gleði og gagns fyri arbeiðsfólk í Havn. (Mynd: Tjóðsavnið 3350F02626)*

fiskinum, og stórur vandi var fyri, at fiskurin ikki lá nóg tryggur í heldur vánaliga pakkhúsinum í Álakeri.

Fyri at koma hesum vansanum til lívs hevði amtmaðurin avgjørt, at ráfiskamóttøkan skuldi steðga við endan á julimánaði, og harumframt hevði hann tikið stig til, at fiskurin varð sýnaður, áðrenn hann fór úr pakkhúsinum til niðurskipingar, so at trygd fekst fyri, at eingin vánaligur fiskur fór avstað. Viðvíkjandi sjálvari framleiðsluni helt hann ikki, at nakar serligur munur var á mannagongdini í Havn og henni, sum var lýst í ritinum hjá amtmanninum fyri Suðuramt í Íslandi. Hann hevði kortini givið Jacobæusi eitt avrit og kunngjørt framleiðslureglurnar fyri íbúgvunum.

Amtmaðurin ivaðist ikki í, at Handilsstjórnin hevði rætt í, at tað fyri handilin var ein fyrimunur bara at virka turran fisk, „men at det ogsaa skulde have været saameget fordelagtigere for Indbyggerne, maa jeg aldeles nægte.“ Fyri hann var tað serliga fyrimunurin fyri føroyingar, sum var avgerandi, og sum heild er stóri munurin á hugsanum amtmansins og Handilsstjórnarinnar, at Handilsstjórnin hugsaði um roknskapin hjá handlinum, meðan amtmaðurin hevði alt samfelagið í huga.

Amtmaðurin helt, at Handilsstjórnin var nakað einoygd í sínum útrokningum, tá ið hon bara inntøkuførdi tað, sum fiskurin gav á uppboðssølu í Keypmannahavn. Hon hevði ikki tikið við tað, sum handilin hevði fingið av vinningin upp á at selja 416 tunnur av salti til framleiðsluna, og hon hevði heldur ikki hugsað um, at um hesin fiskurin ikki varð avreiddur, so hevði hann bara verið nýttur til

døgurðamat, tí fiskurin hevði ikki endað sum turrur fiskur summarmánaðirnar. Harvið hevði handilin heldur ikki fingið vinningin av teimum vørunum, sum útróðrarmenn høvdu keypt fyri teir 4000 ríkisdálarnar, sum teir høvdu fingið fyri ráfiskin.

Amtmaðurin helt, at føroyingar dugdu betur at rokna út, hvussu teir fingu sum mest fyri sínar vørur, enn Handilsstjórnin dugdi, so um turrur fiskur hevði verið meira lønandi fyri útróðrarmannin, so hevði hann uttan iva sjálvur valt tann møguleikan. Fiskur fiskaður í mai, juni og juli fekst ikki turrur, og tí fór ongin at fiska meira enn til dagliga føði hesar mánaðirnar, um tað ikki bar til at avreiða ráfisk. Harumframt var tað krevjandi at turka fiskin. Tann, sum fiskaði, skuldi hava ein hjall at hanga fiskin upp í, og tá ið hann var fullur, og tað kundi hann hjá fátæka húsmanninum, sum ikki hevði so gott pláss, gerast eftir tveir góðar túrar, kundi hann ikki fiska meira, fyrr enn upphongdi fiskurin var turrur. Meðan fiskurin hekk uppi, fór nógv tíð til at ansa eftir honum dagliga, og øll henda tíðin hevði verið nógv betur farin við at rógva út. Sjálvt um tað hevði eydnast at hongt allan fiskin upp, so hendi tað so at siga altíð, at ein partur av honum fekk skaða og varð vrakaður í handlinum.

Allar hesar umstøður gjørdu, at „Færingen ved den endelige Opgjørelse stedse finder, at han har været bedre tjent med at sælge sin Fisk raa, end med at tørre den.“ Afturat hesum kom so, at tað fyri tann fátæka føroyingin hevði stóran týdning at fáa pening fyri fiskin beinanvegin heldur enn at bíða í fleiri mánaðir, til tað bar til at sleppa av við turra fiskin. Amtmaðurin var framvegis ivaleysur í, at „samtlige disse Grunde synes mig gjør det forklarligt nok, at Færingerne i høi Grad ønske, at Indkjøbet af raae Fisk for Handelens Regning maa vedblive og udvides.“

At veðurlagið skuldi vera nøkur forðing fyri at framleiða klippfisk í Føroyum, vildi amtmaðurin als ikki góðtaka. Hann vísti serliga til, at veðurlagið var mestsum tað sama sum í Hetlandi, og haðani vóru stórar nøgdir av frálíkum klippfiski útfluttar á hvørjum ári, og „at det samme kan skee her, har ogsaa været viist, idet al den Klipfisk, som aarlig er virket her i Sommermaanederne har været fortrinlig god.“ Tað var bara fiskurin, sum skuldi virkast út á heystið, sum miseydnaðist.

Amtmaðurin helt tí fast í, at heldur enn at niðurlaga klippfiskaframleiðsluna aftur, áttu føroyingar at verið eggjaðir til at fiska nógv meir um summarið, enn teir higartil høvdu gjørt, og føroyingar vóru sambært amtmanninum til reiðar, tí teir høvdu „gjentagende og gjentagende anmodet mig om, at skaffe dem Leilighed til at sælge deres raa Fisk paa flere Steder end her ved Thorshavn.“ Hetta hevði amtmaðurin eisini gjørt, um onkur loysn var á flutningstrupulleikunum, sum vísti seg í sambandi við virksemið í Klaksvík. Amtmaðurin segði, at handilsforvaltarin hevði fingið Handilsstjórnina at steðga hesari nýtsluni av jaktini, og hann hevði avgjørt at góðtaka tað, sjálvt um „denne Indberetning fra Handelsforvalter Nolsøe var urigtig.“



*Amtmaðurin vildi hava føroyingar at fiska meira um summarið. Á myndini verður fiskur turkaður bæði á Viðarnesi og á Sandagerðisnesi. (Mynd: Tjóðsavnið 4279F06)*

Í staðin hevði hann avgjørt, at ein treyt fyri móttøku av ráfiski norðanfyri var, at íbúgvarnir har sjálvir skipaðu fyri at flyta fiskin til Havnar. Hetta gjørdi hann m.a. tí, at so nógvar inniligar áheitanir vóru komnar úr Norðoyggjum og norðara parti av Streymoynni og Eysturoynni um at fáa møguleika at avreiða. Av Eiði og úr Tjørnuvík hevði hann frætt, at menn vóru sinnaðir til at góðtaka hesar treytir, og hann væntaði, at tað sama hendi í Norðoyggjum, og tí var ætlanin at seta ein mann í hvørjum stað í starv at taka sær av ráfiskamóttøku og salting teir tríggjar summarmánaðirnar. Sum víst á omanfyri vildu norðingar ikki góðtaka hesar treytir, og tí steðgaði ráfiskamóttøkan har, meðan sama virksemið byrjaði á Eiði í 1851, sum greitt skal verða nærri frá seinni.

Upprunaliga skuldi fiskamóttøka vera í juni og juli, men í Havn hevði amtmaðurin avgjørt at byrja móttøkuna 1. mars, eins og hann hevði gjørt árið fyri, og tað gjørdi hann serliga fyri at eggja teimum fátøku til at fiska. Hjá teimum hevði veturin verið harður, tí veðrið hevði sjáldan verið til vildar til at rógva út. Harumframt vóru heilsulig atlit at taka, tí fiskamóttøkan gav møguleika fyri at keypa mat, so at tey ikki noyddust at „leve af lutter Fisk."

Viðvíkjandi møguleikanum fyri at fara yvir til heldur at framleiða saltfisk sum cabliau, so var tað hetta, sum belgisku og fronsku skipini gjørdu, og um føroyski fiskurin fekk ein annan marknað enn Keypmannahavn, bar tað kanska til, men sær vitandi var eingin áhugi fyri slíkari vøru í Keypmannahavn. Ein maður hevði árið fyri sent nakrar tunnur av saltfiski til Keypmannahavnar, men tað vísti seg, at áhugin fyri at keypa henda frálíka fiskin var so lítil, at hann neyvan slapp av við hann uttan at hava tap av søluni.

Tað, sum Handilsstjórnin hevði sagt um ringar tíðir í Føroyum, tí færri vørur komu til Danmarkar, og meir peningur var tikin úr Sparikassanum, skilti amtmaðurin einki av. Vøruútflutningurin var sum heild minst líka góður sum undanfarin ár, og orsøkin til, at minni varð útflutt av lýsi og tálg, var heilt einfalt tann, at færri grindir høvdu verið í árinum, og Skibsted hevði keypt nógv av tálgini til at stoypa ljós. Minni av turrum fiski varð útfluttur, men vøksturin í klippfiskaútflutninginum gjørdi, at samlaði fiskaútflutningurin var vaksin. Viðvíkjandi Sparikassanum segði Dahlerup, at „det forundrer mig at Handelsdirectionen saa dristig vil bygge Conclusioner paa Præmisser, som det lader til, at den ikke kjender.“ Tað var nevniliga langt frá sannleikanum, tí ognin í Sparikassanum var munandi størri við endan á 1850, enn hon hevði verið við ársenda 1849. Hann helt, at stjórnin helst var skuffað av, at nógv fleiri lán vóru latin til fasta ogn í árinum enn undanfarin ár. Hetta komst mest av nógvum deyðsføllum og øðrum tilvildarligum hendingum. Amtmaðurin sá onga orsøk til at óttast, tí prísurin á jørð hækkaði, og virðið á útflutingsvørunum var framvegis oman fyri virðið á innflutningsvørunum, og hann hevði als einki merkt til nakra búskaparliga niðurgongd í „det daglige Liv eller mine Sammenkomster med Beboerne.“[387] Í hesi seinastu eygleiðingini var hann nakað bráður, tí stutt eftir fór serliga hægri kornprísur at merkjast hjá fátækara partinum av fólkinum. Tað verður nærri viðgjørt í kapitli 17.1.

### *16.1.5.3 Royna at sleppa av við Jacobæus*

At Handilsstjórnin vildi fara langt fyri at steðga menningini av klippfiskaframleiðsluni, kom til sjóndar, tá ið tað kom undan kavi, at Handilsstjórnin saman við handilsforvaltaranum var farin undir eina miðvísa ætlan at seta fiskavirkaran Jacobæus í ringt orð. Endamálið við hesi ætlan kann illa vera annað enn ein roynd at sleppa av við Jacobæus, og hugsanin tykist vera, at um tað eydnaðist, so fór tað at verða endin á klippfiskaframleiðsluni.

Tað var helst Nolsøe handilsforvaltari, sum upprunaliga fekk hugskotið um at løna einum húskalli hjá Jacobæusi og einum arbeiðsmanni fyri at njósnast eftir atfinningarsomum viðurskiftum hjá Jacobæusi fyri seg, men í 1849 gav Handilsstjórnin handilsforvaltaranum loyvi til at fremja hesa njósningina. Húskallurin æt Poul Joensen Nolsøe, og arbeiðsmaðurin æt Zacharias Antoniussen. Teir báðir bóru handilsforvaltaranum ymiska kunning um tað, sum Jacobæus gjørdi, og á vári 1850 var handilsforvaltarin til reiðar at ákæra Jacobæus fyri at hava snýtt við saltinum, og hann segði eisini, at ólag var á innkeypinum og viðgerðini av fiskinum. Hesar ákærur tók Handilsstjórnin til sín, og handilsforvaltarin fekk boð um at kanna málið gjølligari og finna fram ítøkilig prógv. Tá ið prógv vóru

387 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 89. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 15. apríl 1851.

komin, fór Handilsstjórnin at taka støðu til, um endurgjaldskrav skuldi setast fram móti Jacobæusi[388].

Tá ið amtmaðurin frætti um hetta, helt hann, at tað var sera løgið, at Handilsstjórnin hevði biðið handilsforvaltaran kanna ein starvsettan, tí amtmaðurin hevði sambært resolutión frá 14. september 1841 til uppgávu at hava eftirlit við øllum handlinum viðvíkjandi[389]. Út frá hesum er rímiliga týðiligt, hvør var í parti við hvørjum, og at Handilsstjórnin og handilsforvaltarin helst vildu halda amtmannin uttanfyri, so leingi tað bar til, tí teir vistu, at hann fór at verja Jacobæus og helst eisini at tulka hesa atgerð sum eitt álop á klippfiskaframleiðsluna, og tað fingu teir rætt í, tí tað var júst tað, Dahlerup amtmaður gjørdi, tá ið hann vendi sær til Innanríkisráðið við málinum.

Amtmaðurin greiddi frá, at hann, líka síðani hann kom til landið, hevði merkt, at Nolsøe hevði „en stærk Animositet" ímóti Jacobæusi, og at hann áhaldandi hevði tosað ilt um hann við amtmannin. Hann hevði biðið forvaltaran lagt fram prógv, so hann kundi taka stig til at kanna viðurskiftini hjá Jacobæusi nærri, og handilsforvaltarin hevði svarað, at hann skuldi vísa honum prógv, tá ið roknskapurin hjá Jacobæusi fyri árið 1849 kom inn.

Hesi úttalilsi gjørdu, at amtmaðurin hevði hildið eyka væl eyga við virkseminum hjá Jacobæusi, og hann var javnan í Álakeri og hugdi í roknskaparbøkurnar, men hann fann ongantíð nakað tekin til óreiðiligheit. Hvørja ferð, hann vitjaði í Álakeri, var Jacobæus í gongd við sínar uppgávur í fiskaframleiðsluni, og roknskaparbøkurnar vóru altíð í lagi. Millum havnarfólk tóktist semja vera um at rósa Jacobæusi, tí hann var til reiðar at taka ímóti fiski tíðliga og seint uttan at gremja seg, og eingin hevði sagt nakað um, at hann ikki dugdi sítt arbeiði sum fiskavirkari. Tá ið roknskapurin kom, vísti hann seg eisini at vera gjørdur til fulnar. Einasti vansin var, at nakað minni var at turkaðum stórum fiski og nakað meir av minni fiski, men orsøkin var helst, at fiskurin kundi minka nakað í støðd í framleiðsluni frá ráfiski til klippfisk.

Tá ið handilsforvaltarin segði amtmanninum, at hann hevði fingið loyvi frá Handilsstjórnini at fáa tveir mans at halda eyga við Jacobæusi, hevði amtmaðurin beinanvegin sagt, at tað dámdi honum sera illa, og hann helt, at talan mátti vera um ein misskiljing, um Handilsstjórnin hevði givið sítt samtykki til, at ein húskallur varð settur at spionera húsbónda sín. Tað kom tí sera óvart á, tá ið hann í roknskapinum fyri klippfiskaframleiðsluna sá ein post, sum æt „for Control", tí talan var um gjald fyri njósningina hjá Poul Joensen og Zachariasi Antoniussen. Handilsforvaltarin hevði nevnt hesar báðar „medhjælpere i Fiskeberedningen", men tað var ikki satt, tí talan var um ein húskall og ein dagleigara. Sum sannleiksvitni helt amtmaðurin ikki nógv um teir báðir, tí Poul Joensen var í stóran mun oyðilagdur av rúsdrekka, og tá ið hann søkti um at sleppa at taka ímóti fiski

388 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 210. Bræv frá Handilsstjórnini til handilsforvaltaran dagfest 14. mai 1850. Her er avrit í málinum hjá amtinum.

389 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 499, Bræv til Innanríkisráðið dagfest 22. juni 1850.



*Tveir njósnarar fylgdu í 1849 við í øllum tí, sum Jacobæus gjørdi. Vónin var, at teir skuldu fáa so mikið av upplýsingum til vega, at tað fór at eydnast handilsforvaltaranum at koyra Jacobæus úr starvi og á tann hátt steðga menningini av føroyskari fiskivinnu. (Mynd: Tjóðsavnið 8861F037)*

fyri handilin í Suðuroynni, hevði amtmaðurin frámælt tí av somu orsøk. Hann hevði eisini fyrr mist arbeiði sítt við handilin orsakað av rúsdrekkamisnýtslu.

Jacobæus var longu í starvi, tá ið Dahlerup kom til Føroya sum amtmaður, so hann visti lítið um, hvussu hann hevði verið áðrenn tað, men nú var hann í hvussu er virðiligur maður privat, og hann var eisini ein dugnaligur fiskaframleiðari. Við tí grundarlagnum, sum handilsforvaltarin var komin við, helt amtmaðurin tí onga orsøk vera til at rættarforfylgja manninum, og hann mælti eisini frá at siga honum úr starvi, tí tað fór at verða torført at finna nakran annan líka dugnaligan mann.

Tá ið amtmaðurin hugsaði um hetta málið í samanhangi við tað, sum var hent við ætlan amtmansins í Klaksvík, kom hann til ta greiðu niðurstøðu, at

> Handelsforvalterens Uvillie ikke saameget gjælder Jacobæus personlig, som hans Virksomhed qva Fiskebereder. Naar jeg navnlig seer, at Handelsforvalteren anbefaler Poul Joensen og Zacharias Antoniussen til at blive ansatte som Fiskeberedere istedetfor Jacobæus, maa jeg næsten troe, at det er hans Hensigt, at see den for Landet saa velgjørende og for den kongelige Handel fordelagtige Klipfisketilvirkning bragt til at gaae overstyr.

Tá ið amtmaðurin tók saman um orsøkina til, at handilsforvaltarin var so nógv ímóti klippfiskaframleiðsluni, var hann ikki sørt persónligur, tá ið hann segði:

> At Handelsforvalter Nolsøe ikke ynder Klipfiskevirkning her paa Øerne har jeg længe vidst; han har sikkert havt en meget betydelig Indtægt af Handelen

> med den tørrede Fisk, en Indtægt, som i enkelte Aar endog skal have beløbet sig til flere tusinde Rbdlr. Naar Beboerne sælge en betydelig Deel af deres Fisk til at virkes til Klipfisk, istedetfor at tørre den, vil denne Indtægt meget formindskes; muligt at denne Betragtning i Forbindelse med den for gamle Folk ikke ualmindelige Uvillie mod Indførelsen af nye Foranstaltninger har sat ham ude af stand til uhildet at bedømme Gavnligheden af Klipfiskevirkningen.

Amtmaðurin ivaðist við øðrum orðum ikki í, at orsøkin til mótstøðuna móti klippfiskaframleiðsluni var í tveimum. Onnur var vanligur illvilji hjá gamla ættarliðinum móti øllum nýggjum, og hin var, at henda framleiðsla gjørdi seg inn á eina trivaliga eykainntøku, sum handilsforvaltarin hevði í teirri ekstraktivu einahandilsskipanini.

Amtmaðurin noyddist at leggja uppí, tá ið Handilsstjórnin bygdi sínar avgerðir á tað, sum handilsforvaltarin fortaldi henni um fiskavirkingina, tí hann vildi ikki missa dugnaliga fiskavirkaran orsakað av hesum ávum. Fyri at sleppa undan tílíkum misskiljingum í framtíðini, mælti hann til, at samskiftið millum Handilsstjórnina og handilsforvaltara framyvir gekk ígjøgnum seg[390].

Sjálvt um einki rættiligt prógv er fyri tí, bendir nógv á, at tað var hetta málið, sum fekk handilsforvaltaran at avgera at siga seg úr starvi. Í hvussu er kundi amtmaðurin tríggjar dagar eftir, at hann skrivaði brævið til Innanríkisráðið, boða frá, at handilsforvaltarin ætlaði at fara til Danmarkar við handilsskipinum „Hector", tí hann ætlaði at søkja um at sleppa úr starvi sínum. Í fyrstu syftu kundi Lunddahl fúti avloysa handilsforvaltaran, men eingin av embætismonnunum kundi átaka sær hesa uppgávu í longri tíð. Í handlinum var eingin, sum var egnaður at taka yvir, men um ynski var um, at tann, sum varð fyribilssettur, kendi føroysk viðurskifti, so kundi amtmaðurin mæla til Skibsted, sum nú búði í Føroyum[391].

Innanríkisráðið tók undir við amtmanninum í málinum, men tað valdi kortini at hoyra Handilsstjórnina, áðrenn endalig avgerð var tikin viðvíkjandi Jacobæusi. Handilsstjórnin greiddi frá, at allir faktorar og onnur fólk hjá handlinum vóru undir handilsforvaltaranum sambært lógini frá 1836, og tá ið spurningurin tók seg upp um at seta fiskavirkara í 1849, mælti Handilsstjórnin til, at eisini hann skuldi vera undirlagdur handilsforvaltaran. Hetta var í innstillingini hjá Innanríkisráðnum broytt til, at tað var amtmaðurin, sum í samráð við handilsforvaltaran skuldi

---

390 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 499, Bræv til Innanríkisráðið dagfest 22. juni 1850.

391 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 495. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 15. ella 25. juni 1850. Brævið stendur í kopibókini millum brøv dagfest ávikavist 24. og 27. juni, men í dagfestingini av hesum brævinum er 2-talið broytt til eitt 1-tal í tveimum støðum. Fyri mær tykist tað tí, sum at brævið er skrivað 25. juni, men av onkrari orsøk seinni er broytt til 15. Samsvarandi er talfestingin á brøvunum broytt, so at tað, sum upprunaliga var bræv nummar 501 er vorðið til bræv nummar 495, sjálvt um tað stendur skrivað millum brøv nummar 500 og 502. Okkurt bendir á, at tað av onkrari orsøk seinni gjørdist umráðandi at tíðarfesta avgerð handilsforvaltarans um at siga seg úr starvi, soleiðis at hon var tikin, áðrenn amtmaðurin kom við ábreiðslum sínum.



*Royndin hjá handilsforvaltaranum at koyra Jacobæus frá endaði við, at hann sjálvur noyddist at siga seg út starvi. Av onkrari orsøk er dagfestingin á hesum brævinum til Innanríkisráðið broytt frá 25. juni til 15. juni.*

seta fiskavirkaran, og Handilsstjórnin helt, at tað gjørdi, at handilsforvaltarin var leysur av ábyrgd av misrøkt fiskavirkarans, tá ið tað nú var ein, sum hann hevði misálit á, sum varð settur.

Hjá Handilsstjórnini vóru bara tveir møguleikar í at velja. Annar var at siga handilsforvaltaran upp, og hin var at seta í gongd eina kanning av klagunum móti Jacobæusi. Teir vónaðu, at málaráðið skilti, at teir høvdu valt henda seinna møguleikan, og at Nolsøe ikki kundi hava ábyrgd av nøkrum viðvíkjandi klippfiskaframleiðsluni, soleiðis sum støðan var[392]. Rosenørn innanríkisráðharri tók hetta tilmælið til eftirtektar og bað amtmannin kanna málið nærri og senda sær avhoyringar í málinum saman við einum tilmæli[393].

Tað gjørdi amtmaðurin 6. august 1851. Í frágreiðingini hjá amtmanninum kom fram, at Jacobæus var ákærdur fyri at hava býtt stóran fisk um við smærri fisk, at hann hevði sett minni nøgd av smáfiski á kvittanirnar til útróðrarmenn, enn teir høvdu avreitt, at hann við handilsins peningi skuldi havt goldið fyri kalva, sum hann hevði keypt til sín sjálvs, at hann hevði nýtt bastmottur hjá

392 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 210. Bræv frá Handilsstjórnini til Innanríkisráðið dagfest 16. september 1850. Her í avritinum hjá amtmanninum.

393 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 210. Bræv frá Rosenørn innanríkisráðharra dagfest 28. september 1850.

handlinum til egna nýtslu, og at hann skuldi havt nýtt 2 ¾ tunnur av handilsins salti til sína privatu nýtslu.

Fyrsta ákæran komst av, at minni av stórum toski hevði verið í avskipingini í 1849, enn tað skuldi havt verið, men hinvegin var nógv meir til av smáfiski, enn keypt varð. Jacobæus hevði greitt frá, at orsøkin til hetta var, at ein partur av tí stóra fiskinum var krympaður undir virkingini, soleiðis at hann svaraði til støddina á smáfiski, tá ið hann varð avskipaður. Bæði teir, sum skipaðu klippfiskin umborð, og handilsforvaltarin sjálvur høvdu sagt, at hetta var ein rímilig frágreiðing. Jacobæus hevði viðgingið, at hann viðhvørt tók fisk heim við til egna nýtslu, men tá syrgdi hann altíð fyri at lata somu mongd aftur. Hetta var átalað, men var neyvan orsøk til ójavnan í tølunum. Tá ið hann fekk at vita, at hetta ikki bar til, var Jacobæus hildin uppat við at gera tað.

Jacobæus hevði í instruxum sínum fingið greið boð um at halda smáfisk og stóran fisk hvør sær undir viðgerðini, og tí dugdi amtmaðurin ikki at síggja, hvør fyrimunur skuldi vera við at skriva skeiv tøl í avreiðingarkvittanirnar. Hinvegin kundi nógv trýst vera á, tá ið nógvir bátar vildu avreiða tosk samstundis, og tá var tað so skjótt, at onkur villa sníkti seg inn. Einki prógv var fyri, at hann skuldi havt keypt kalva til sín sjálvs fyri handilsins pening, og tað var heldur ikki prógvað, at Jacobæus skuldi havt nýtt handilsins bastmottur til egna nýtslu.

Viðvíkjandi ákæruni um at hava nýtt av handilsins salti høvdu avhoyringarnar víst, at mátin, sum Jacobæus hevði umsitið saltið uppá, gjørdi henda illgruna møguligan, men tað var framvegis bara ein illgruni. Tað var skeivt av Jacobæusi at nýta handilsins salt privat, men soleiðis sum amtmaðurin kendi hann, roknaði hann ikki við, at endamálið hjá Jacobæusi var at snýta handilin. Amtmaðurin ivaðist ikki í, at Jacobæus hevði hildið seg havt rætt til at nýta saltið, sum hann vildi, um hann bara hevði roknskap yvir nýtsluna. Í 1849 hevði handilsforvaltarin ikki átalað, at Jacobæus hevði nýtt salt til at virka klippfisk til egna nýtslu, tvørturímóti hevði hann fingið hann at virka 3 skippund til sín sjálvs, og tá varð salt frá handlinum eisini nýtt. Hvør skal siga, snýtti Jacobæus, so snýtti handilsforvaltarin eisini.

Eftirlitið hjá húskalli Jacobæusar hevði verið so gott, at hann hevði skrivað niður bæði tað, sum hann hevði lagt merki til, og tað, sum hann helt seg leggja merki til. Amtmaðurin helt ikki, at hann hevði fyri neyðini at siga, hvussu ósømiligt hann helt tað vera at seta ein húskall at spionera sín húsbónda, og hvussu óverdugt hann helt tað vera, at billa húskallinum inn, at hann var bundin av eiðinum, sum hann hevði lagt, tá ið hann arbeiddi í handlinum. At hava ein njósnara, sum allan dagin arbeiddi so tætt við Jacobæus, gjørdi, at alt, sum kundi átalast, varð fráboðað til handilsforvaltaran. Amtmaðurin ivaðist ikki í, at tað, sum Jacobæus kundi havt gjørt skeivt, var íkomið av „eenfoldighed" og misfatan av, hvat hann hevði rætt og skyldu til. Tí mælti hann til, at Jacobæus slapp undan víðari tiltalu, afturfyri at hann fekk eina átalu um at halda seg neyvt

*Eftir at Jákup Nolsøe hevði lagt frá sær sum handilsforvaltari, tók Johan C.E. Kauffeldt við. Hann røkti starvið, til Einahandilin varð avtikin í 1856, og hann samstarvaði sum heild væl við Jacobæus fiskavirkara og Dahlerup amtmann. (Mynd: Havnar søga V)*



til ta reglugerð, sum hann hevði fingið at ganga eftir[394]. Innanríkisráðið fylgdi amtmansins ráðum um ikki at átala hann hesa ferð, men hann skuldi minnast á, at hann skuldi halda seg til instruxini, sum hann hevði fingið[395].

Tá ið Innanríkisráðið tók hesa avgerðina, hevði ósemjan millum Jacob Nolsøe handilsforvaltara og Jacobæus fingið ein enda, tí Jacob Nolsøe fór frá sum handilsforvaltari 1. januar 1851. Í hansara stað kom Johan C.E. Kauffeldt, men hann var bara settur í nøkur fá ár, tí tá var tað greitt, at fríhandilin var á veg (Nolsøe og Jespersen 2009: 356). Jacob Nolsøe gjørdist 94 ára gamal, áðrenn hann doyði í 1869 (Nolsøe og Jespersen 2009: 355).

Søgan um tvídráttin millum Nolsøe handilsforvaltara og fiskavirkaran Jacobæus er ein klassisk søga um, at tann, sum ætlar at gera av við ein annan, sjálvur kann fella á váli. Samstundis er søgan um hesar báðar persónarnar eisini ein góð mynd av yvirskipaðu søguni, har Jacob Nolsøe umboðar gomlu tíðina, meðan Jacobæus umboðar nýggju tíðina. Við tí valdinum, sum amtmaðurin hevði, kundi hann syrgja fyri, at Jacobæus yvirlivdi, meðan Nolsøe noyddist at siga seg úr starvi. Amtmaðurin og vald hansara vóru avgerandi fyrimunir hjá nýggju tíðini.

394 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 162. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 6. august 1851.
395 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 923. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 26. august 1851.



*Nakað nógv av fyrstu tíðini hjá Dahlerup í amtmanshúsinum fór til at tryggja, at menningini av fiskivinnuni slapp at halda áfram (Mynd: Tjóðsavnið 5101F011)*

### 16.1.6 Stytta um móttøkutíðina

Tá ið nýggi handilsforvaltarin var komin, var spurningurin, hvussu viðurskiftini fóru at verða millum hann, Jacobæus og amtmannin. Henda veturin, 1850-51, miseydnaðist fiskiskapurin fullkomiliga, tí sjálvt á bestu fiskiplássum hevði lítið verið at fingið bæði til vetrar- og várfiskiskap. Stóri toskurin, sum plagdi at vera undir landi hesa tíðina, var mestsum horvin, og amtmaðurin sjálvur helt, at møguliga var toskurin farin longur norður undan lýggja veðrinum í Føroyum og Íslandi[396]. Fiskiskapurin batnaði móti sumri, og í juni 1851 boðaði Jacobæus frá, at væl av klippfiski var komin í pakkhúsið í Álakeri. Tað gjørdi, at tað var umráðandi at fáa umvælt tekjuna á pakkhúsinum, tí tað lak fleiri staðni, og eftir at lekarnir vóru tettir, trongdi tað eisini til at tjørast[397].

Henda uppgávan at gera nakað við tekjuna á pakkhúsinum elvdi til tvístøðu um, hvør tað var, sum tók avgerðir viðvíkjandi klippfiskavirkseminum. Jacobæus vendi sær beinleiðis til amtmannin við hesum málinum, og tað fekk ilt í nýggja handilsforvaltaran Kauffeldt, tí hann kendi als einki til trupulleikan, sjávt um Jacobæus arbeiddi undir sær, og at Jacobæus soleiðis fór uttan um handilsforvaltaran gjørdi, at handilsforvaltarin kendi seg settan í ringt ljós. Hetta „hverken kan eller vil jeg finde mig i", segði handilsforvaltarin við Jacobæus sama dag, sum hann fekk boð frá amtmanninum, og hann gav Jacobæusi greið boð um, at

396 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 131. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 13. juni 1851.
397 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 818. Bræv frá Jacobæus, dagfest 23. juni 1851.

hann fyrst og fremst skuldi samskifta við seg. Annars ivaðist hann í, um húsið í Álakeri var í verri standi, enn tað altíð hevði verið. Hann ivaðist í, um nøkur umvæling megnaði at fáa takið tætt, tí av royndum visti hann, hvussu torført tað var at fáa sjálvt góð brettitøk tøtt, og har var talan um eitt hús, sum í stóran mun var skeivt bygt og hevði alt ov veikar sperrur til eitt so stórt tak. Tjøringin av handilsbygningum hevði verið í gongd leingi, men veðrið forðaði fyri, at arbeiðið gekk so skjótt, sum ynskiligt var, men nú vóru ikki nógvir dagar eftir, til tjøringin av húsinum í Álakeri var á skránni. Tað mátti nú bíða, til handilin fekk fatur í timburmonnum at umvæla takið[398].

At handilsforvaltarin soleiðis kravdi av Jacobæusi, at hann skuldi samskifta beinleiðis við seg, vildi amtmaðurin ikki góðtaka, tí handilsforvaltarin hevði bara skyldu til at hava eftirlit við Jacobæusi, men í aðrar mátar var Jacobæus ikki undirlagdur handilsforvaltaran, og tí var einki í vegin fyri, at hann vendi sær til amtmannin við einum máli sum hesum. Amtmaðurin gav samstundis handilsforvaltaranum boð um at møta í pakkhúsinum klokkan 6 sama dag, so at amtmaðurin kundi taka støðu til, um nøkur umvæling av takinum skuldi gerast[399]. Á fundinum munnu teir hava funnið eina semju um, hvussu samskiftið skuldi vera, tí eftir tað hoyrdist lítið og einki um stríð millum hesar tríggjar í eini 2-3 ár.

Tá ið úrslitið fyri árið 1851 varð uppgjørt, vísti tað, at 6.188 lispund av klippfiski, sum fólk høvdu fingið nógva inntøku burturúr, vóru útflutt. Amtmaðurin sá, at samfelagið var í ferð við at broytast og viðmerkti: „At Beboerne i de sidstforløbne Aaringer have anvendt mest Flid paa Fiskierne er let forklarligt, naar man betænker, at denne Erhvervsgren i Reglen strax giver et Udbytte, hvadenten dette nu bliver stort eller lidet, medens Agerbruget derimod fordrer, at man skal vente længere Tid, inden man kan høste Frugten af sit Arbeide.“[400] Samfelagið var farið at flyta seg frá at vera eitt landbúnaðarsamfelag til at verða eitt fiskivinnusamfelag.

Ætlanin at avmarka tíðina fyri fiskamóttøku til at enda 31. juli varð ikki gjøgnumførd í 1851, tí Innanríkisráðið helt, at tað bar ikki til at nokta fyri at taka ímóti fiski fram til 31. august, tí tað var tað, sum stóð í gomlu resolutiónunum[401]. Hesi boðini komu nokk so seint til Føroya, og tí spurdi Jacobæus 21. juli, nær ætlanin var at steðga. Hann vísti á, at um veðrið fór at halda sær, so fór fiskurin, sum teir høvdu tikið ímóti, at verða liðugt framleiddur um 8 til 10 dagar. Jacobæus royndi eisini at siga, at fiskurin, sum varð keyptur síðst í august, kundi goymast til summarið eftir, um teir ikki megnaðu at fáa hann nóg turran um heystið. Tann fiskurin fór so at koma tíðliga á marknaðin og fór harvið at geva ein góðan

398 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 818. Bræv frá Kauffeldt handilsforvaltara, dagfest 24. juni 1851.

399 TSS. Færø Amt. Kopibók CC, bræv nr. 953. Bræv til handilsforvaltaran dagfest 24. juni 1851.

400 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 14. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 26. juni 1852.

401 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 874. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 3. juli 1851.

prís. August var eisini ein av bestu fiskimánaðunum, men um tað ikki slapst av við fiskin, so helt fiskiskapurin bara uppat, tí ongin fór at fiska til onga nyttu, og til turran fisk bar ikki til at nýta fiskin, sum var fiskaður í august[402].

Tá ið uppskotið hjá Handilsstjórnini fyri takstprísir í 1852 var fyri, varð avgjørt at halda fram sum árini frammanundan viðvíkjandi klippfiskinum, men at avmarka móttøkuna til endan á julimánaði. Tað kom at standa í resolutiónini, sum kongur undirskrivaði 27. februar 1852[403]. Hvussu væl henda avgerðin varð kunngjørd í Føroyum man vera ivasamt, tí mitt í juli 1852 vendi Jacobæus sær aftur til amtmannin við boðum um, at fólk áhaldandi høvdu spurt, um ætlanin var at steðga móttøkuni 31. juli. Grundgevingar hansara vóru tær somu sum árið fyri, men hann legði eisini afturat, at henda avgerðin var óheppin, tí fleiri av teimum fólkunum, sum nýttu møguleikan at avreiða, høvdu trongar umstøður, og henda avmarkingin bøtti ikki um tað[404].

Hvussu stóran týdning, fiskamóttøkan hevði fyri havnarfólk, vísti seg stutt eftir, tí 24. juli mótmæltu 40 havnarmenn, at avreiðingartíðin varð stytt. Teir heittu á myndugleikarnar um at sleppa at avreiða í hvussu er í august. Í skrivinum søgdu teir, at allur fiskurin, sum ikki varð etin feskur, fór at fara til spillis, eins og støðan hevði verið við tí seiðinum, sum var fangaður í julimánað, sum amtmaðurin kendi alt til. Teir vónaðu, at amtmaðurin fór at vísa ein góðan vilja og arbeiða fyri, at innkeypið av ráfiski gjørdist so gagnligt fyri havnarmenn, sum til bar. Um tað ikki bar til at ganga ynskinum á møti í ár, so vildu teir hava tað gjørt árið eftir[405].

Amtmaðurin svaraði stutt og greitt, at boðini frá Innanríkisráðnum vóru greið, og tí kundi hann ikki gera nakað við tað[406], og sjálvt um mótstøðan var stór, so varð avgerðin ongantíð broytt, tey árini Einahandilin tók ímóti fiski. Henda áheitan og hetta svarið eru áhugaverd, tí tey eru eitt dømi um, hvussu stóran týdning, klippfiskavirkingin hevði fingið fyri íbúgvarnar. Nú var tað ikki longur

402 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 866. Bræv frá Jacobæus dagfest 21. juli 1851.

403 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1317. Bræv frá Innanríkisráðnum dagfest 2. mars 1852.

404 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1532. Bræv frá Jacobæus dagfest 12. juli 1852.

405 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1552. Bræv frá 40 havnarmonnum, lýstir sum „Arbeidsmænd og Fiskere" í journalini, dagfest í Havn 24. juli 1852. Teir, sum skrivaðu undir brævið, vóru Poul Jacobsen, Jacob Jacobsen, Andreas Andreasen, Chr. M. Jacobsen, Joen J. Niclasen, Thomas Niclasen, H. Jacobsen, M.P. Poulsen, Joen Hansen, H.J. Jacobsen, Augustinus Samuelsen, Poul F. Hendriksen, Peder Lava, Jacob Jacobsen, Th. Lava, Hans H. Djurhuus, Th. Poulsen, Jacob Hansen, Jacob Hansen, Andreas Niclasen, J.A. Kjelnes, Mads W. Petersen, Poul Isachsen, Ole Hansen, Samuel Lindenskov, Nicolas Joensen, Ole Even Joensen, Jæger Nr. 17, Andreas Johansen Laih, Jacob Joensen, J. Hansen, H. Hansen, Jacob Zeverinsen, Djone Haldansen, Hendrick Joensen, Hans Joensen, Hans Joensen, Ole Jacobsen, Johannes Joensen og Augustinus Olsen.

406 TSS. Færø Amt. Kopibók DD, bræv nr. 348. Bræv til Streymoyar sýslumann dagfest 31. juli 1852.





*„Arbeidsmænd og Fiskere" undirskrivaðu í juli 1852 bræv til amtmannin við mótmæli ímóti, at avreiðingartíðin varð stytt. Teir, sum skrivaðu undir, umboðaðu nýggju stættina, sum í stóran mun bygdi sína tilveru á møguleikarnar í fiskivinnuni.*

amtmaðurin, sum royndi at eggja íbúgvum til at fara undir nýggju vinnuna. Nú vóru tað teir, sum høvdu tikið av møguleikanum, sum royndu at fáa amtmannin at víðka um møguleikarnar.

Hóast fiskamóttøkan í 1852 stongdi ein mánað fyrr enn árið fyri, so tók hon kortini móti meira fiski. Av stórum fiski komu 17.005 fiskar, og talið á smáfiski var 80.899. Hetta vóru 399 fleiri stórir og 24.952 fleiri smáir fiskar, enn Álaker keypti árið fyri[407].

### 16.1.7 Fiskamóttøka á Eiði

Ráfiskamóttøkan í Klaksvík steðgaði, tá ið tað gjørdist greitt, at norðingar ikki vóru sinnaðir at flyta saltaða fiskin til Havnar. Hetta var eitt vónbrot fyri amtmannin, og tí var tað uttan iva kærkomið, tá ið boð komu um, at menn í norðara enda á Sundalagnum vóru sinnaðir at rógva saltaða fiskin til víðari framleiðslu í Havn, um teir fingu møguleikan ar avreiða ráfisk á Eiði.

Áhugin fyri einari ráfiskamóttøku í økinum var byrjaður í Tjørnuvík, og tá ið sýslumannin H.C. Müller var har á árligu ferð síni í sýsluni á sumri 1849, spurdu teir sýslumaðurin um henda møguleika. Sýslumaðurin helt, at eitt slíkt átak hevði verið „en sand Velgjerning" ikki bara fyri tjørnuvíkingar, men eisini fyri víkamenn og fólk á Langasandi og í Hvalvík og helst eisini fyri bygdirnar eysturoyarmegin Sundalagið. Hesar bygdir høvdu góðar møguleikar at troyta Norðhavið, men

407 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 77. Bræv um Landets Tilstand til Innanríkisráðið dagfest 16. oktober 1852.



*Aggusteinus á Kák var ein av teimum 40 arbeiðs- og útróðrarmonnunum, sum í 1852 skrivaðu undir upp á eitt mótmæli ímóti stytting av avreiðingartíðini. (Mynd: Tjóðsavnið 8966F17)*

fiskivinnan har hevði kunnað givið tvífalt so nógv, um møguleiki var at avreiða ráfisk. Orsøkin var vanliga, at tað bara var hendinga turr og køld summør, at tað bar til at turka fiskin soleiðis, at hann kundi seljast. Tí spiltist fiskurin ofta og varð til onga nyttu. Hetta summarið høvdu víkarmenn ført nakrar bátar av fiski til Havnar, men tað bar bara til í sera góðum veðri, og tá fór flutningurin við nógvari tíð, sum annars kundi verið nýtt til at fiska í[408].

Sýslumaðurin arbeiddi víðari við málinum, og tá ið hann aftur fór at vitja bygdirnar í sýsluni á vári 1850 tosaði hann við víkarmenn og tjørnuvíkingar, og teir vóru samdir um, at tað hevði verið ynskiligt, um tað onkustaðni har í økinum bar til at avreiða fisk heldur enn at fara allan tann langa vegin til Havnar við honum. Sýslumaðurin greiddi teimum frá, at eitt slíkt átak fór at verða dýrt fyri Kongliga handilin, men um teir kundu finna hóskandi høli og ein álítandi mann á einum vælegnaðum stað at átaka sær uppgávuna at taka ímóti fiski og salta hann, var tað ikki ógjørligt, at myndugleikarnir fóru at taka undir við einum slíkum átaki.

408 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S, bræv nr. 915. Bræv frá Streymoyar sýslumanni dagfest 27. juli 1849.



*Tjørnuvíkingar vístu á sumri 1849 stóran áhuga fyri møguleikanum at kunna landa ráfisk norðuri í Sundalagnum.*

Sjálvur hevði sýslumaðurin tosað við kongsbóndan Samuel Johannesen á Eiði, tá ið hann var í Havn onkur ørindi. Samuel hevði lovað, at um amtmaðurin tók undir við tí, so skuldi hann átaka sær uppgávuna fyri hóskandi samsýning. Samuel var versonur dannebrogsmannin Pól á Látrinum, sum í síni tíð hevði verið í Hetlandi og lært at virka klippfisk, og frá honum hevði hann lært um fiskasalting. Sýslumaðurin helt, at Samuel Johannesen í allar mátar var ein álítandi maður, og tí viðmælti hann mannin, og soleiðis legði hann hetta fyri fólkið í norðara parti av Sundalagnum týdningarmikla mál upp í hendurnar á amtmanninum. Fyri at undirstrika týdningin av átakinum, viðmerkti hann eisini, at hetta átak var tiltrongt „i det mindste nu i denne næringsløse Tid", og at tað, júst meðan hann sat og skrivaði, vóru 3 ella 4 bátar úr økinum og avreiddu í Havn[409].

Soleiðis endaði málið á borðinum hjá amtmanninum, um somu tíð sum hann royndi at fáa gongd á ráfiskamóttøkuna í Klaksvík. Amtmaðurin skuldi í slíkum málum ráðføra seg við handilsforvaltaran, og Nolsøe handilsforvaltari svaraði, tá ið hann varð spurdur, at hetta var júst tað, sum hann fyri langari tíð

409 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 41. Bræv frá H.C. Müller, Streymoyar sýslumanni, dagfest 25. mars 1850.

síðani hevði skotið upp fyri bæði Pløyen amtmanni og Handilsstjórnini, tí hann helt, at Pól á Látrinum hevði skyldu at læra verson sín tað, sum hann sjálvur lærdi á ferðini til Hetlands í 1839, tí tað var tað almenna, sum betalti ferðina. Handilsforvaltarin helt, at Samuel Johannesen var ein reiðiligur persónur, sum kundi fáa uppgávuna, men so kravdist, at hann fekk bretti, salt og aðra útgerð til saltingina. Hann hevði eisini helst viljað, at fiskurin var virkaður til klippfisk á Eiði, tí staðið var væl egnað til turkingar, og frá eiðisfólki hevði hann frætt, at har var eitt rúmligt neyst til taks, har fiskurin bæði kundi saltast og stáplast upp, tá ið hann var turkaður til klippfisk[410].

Sýslumaðurin fekk boð um at fara at samráðast við Samuel Johannesen um, hvørjar treytirnar vóru fyri, at hann vildi átaka sær uppgávuna at taka ímóti og salta fiskin í norðara enda á Sundalagnum, og hvørjar treytir vóru fyri, at hann vildi átaka sær at virka fiskin til klippfisk. Samuel gjørdi beinanvegin greitt, at hann undir ongum umstøðum kundi virka fiskin til klippfisk. Hinvegin var hann sinnaður at taka ímóti fiski av Eiði, úr Haldórsvík og Tjørnuvík og øðrum bygdum har í økinum, at fáa til vega neyðuga rúmið til henda fiskin og at geva øllum, sum avreiddu, eitt prógv upp á móttøkuna. Hetta prógv kundi virka sum ávísingarskjal. At enda lovaði hann at hava roknskap yvir, hvussu nógvum fiski, hann tók ímóti.

Treytirnar hjá honum vóru, at teir, sum avreiddu, sjálvir komu til Eiðis við fiskinum og sjálvir avhøvdaðu og skóru ryggin úr fiskinum. Salt og vekt skuldi førast til Eiðis uttan kostnað fyri seg, eins og bretti, sum skuldu liggja undir saltaða fiskinum. Samuel vildi eisini hava boð um, hvør prísurin var. Fyri ómakin og húsarúmdina vildi hann hava 12 ríkisdálar um mánaðin, og hevði hann tørv á fleiri monnum, skuldu teir eisini fáa løn, sum helst skuldi ásetast sum tímaløn. Hann helt ikki, at tímalønin kundi vera minni enn 3 skillingar fyri tíman. At enda helt hann ikki, at hann skuldi hava nakað við flutningin av fiskinum at gera, og hann roknaði við, at handilsjaktin fór at føra fiskin[411]. Henda síðsta treytin mundi vera tann, sum kom tvørast fyri, tí tað var júst hetta við flutninginum við jaktini, sum var í ferð við at gera enda á ráfiskamóttøkuni í Klaksvík. Tí var tað helst eisini tað, sum gjørdi, at tað eftir øllum at døma ikki hendi meira við fiskamóttøku á Eiði í 1850.

Á umferð síni í økinum árið eftir boðaði sýslumaðurin frá, at tað var ein treyt, at útróðrarmenn sjálvir førdu saltaða fiskin til Havnar, og 11. mars skrivaðu allir eiðismenn og víkarmenn undir uppá, at teir høvdu skyldu til at flyta saltaða fiskin til Havnar í fyrstuni innan 14 dagar eftir avreiðing, men seinni bara áðrenn ein mánaður var liðin. Tað varð tó róð fram undir, at tað ikki fór at vera so strangt

410 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 41. Bræv frá Nolsøe handilsforvaltara, dagfest 26. mars 1850.

411 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 41. Bræv frá Samuel Johannesen, dagfest 16. apríl 1850.

við hesum tíðarásetingum, so vanliga fór tað ikki at hava við sær, at teir mistu dagar, sum teir annars høvdu kunnað nýtt til at fiska í.

Víkar- og eiðismenn vóru samdir um, at ein slík fyriskipan fór at gagna teimum, og tí vildu teir takka amtmanninum fyri tilboðið, tí tað var „meget vigtigt for os at kunne afhænde Raafisken, ikke blot fordi det en Tid af Aaret er vanskeligt eller var endog umuligt at virke tilbørlig god Stokfisk, naar den behandles paa den sædvanlige gamle Maade, men tillige fordi der ere mange iblandt os, som ogsaa til andre Tider, for at erholde Livets første Fornødenheder, trænge til at faae den strax betalt.“ Fyri hvønn einstakan var tað trupult beinanvegin at føra fiskin til Havnar at avreiða, tí báturin var lítil, og vegurin var so langur, at tveir dagar fóru til ein slíkan túr, tá ið veðrið var gott. Tí fór minst ein triðingur av teirri tíðini, sum annars kundi verið nýtt til at fiska í, til hesar túrar. Nógv var tí at vinna við hesum átakinum, og tí var tað eisini ynski teirra, at skipanin varð sett í verk heldur fyrr enn seinni.

Sundalagsmenn tóku sostatt av, har norðingar noktaðu, men vilji teirra hevði eitt mark, og har var nakað, sum ørkymlaði teir. Tað var spurningurin um flutningin av salti og øðrum til framleiðsluna, tí teir høvdu vónað, at jaktin hjá handlinum ella okkurt annað líknandi far kundi flutt hetta til Eiðis, uttan at tað kostaði teimum nakað. Tí noyddust teir at siga, at um ætlanin var, at teir skuldu gjalda fyri hetta, so vildu teir ikki taka ímóti tilboðnum, tí tað fór at gerast ov dýrt. Hinvegin vildu teir fegnir føra salt og annað til Eiðis, tá ið teir kortini vóru í Havn og ikki høvdu fullan farm heim við aftur[412].

Sýslumaðurin var á Eiði, tá ið brævið varð skrivað, og hann hevði eisini heitt á Samuel Johannesen um at lata fiskavirkingini eitt hús til saltingina. Tað var hann til reiðar at gera afturfyri 12 ríkisdálar í árligari samsýning. Tað var tað minsta, hann kundi leiga fyri, men um áhugi ikki var fyri hesum, var hann eisini til reiðar at lata húsið púra ókeypis í eitt ár fyri at fáa gongd á. Hinvegin vildi hann sleppa undan at hava nakað við møguliga innrætting av hølinum til salting at gera[413].

Sostatt vóru viðurskiftini viðvíkjandi flutninginum ikki heilt avgreidd í 1851, og tað kundi sæð út til, at tað gjørdi sítt til, at ráfiskamóttøkan á Eiði heldur ikki kom í gongd í 1851. Hinvegin sær út til, at fólk í Sundalagnum høvdu gjørt onkra avtalu við Jacobæus um at salta sín egna fisk, tí tíðliga í mars 1852 væntaði Jacobæus, at eiðismenn og møguliga eisini víkarmenn fóru at koma til

412 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T. Ein kassi við ójournaliseraðum brøvum. Bræv frá eiðismonnum og víkarmonnum, undirskrivað av Joen Peder Olesen, Joen Mikkelsen, Samuel Johannesen, Knud Olsen og Joen Poulsen vegna allar eiðismenn, og Hendrik Heinesen, Hans Joensen, Joen Andreasen, Andreas Joensen og Abraham Jacobsen vegna allar víkarmenn. Brævið er dagfest á Eiði 11. mars 1851.

413 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T. Ein kassi við ójournaliseraðum brøvum. Bræv frá Samuel Johannesen dagfest á Eiði 11. mars 1851.



*Í 1852 bar endiliga til hjá Samuel Johannesen at taka ímóti fiski á Eiði. (Mynd: Tjóðsavnið 5207F130.929)*

Havnar við ráfiski, sum teir høvdu saltað. Afturfyri væntaðu teir at fáa saltið aftur frá Jacobæusi[414].

Tá ið boðini um, at fiskur aftur kundi móttakast í 1852, vóru komin úr Danmark, vendi amtmaðurin sær 27. mars til handilsforvaltaran at spyrja, um tað ikki hevði verið skilagott at tikið ímóti fiski á Eiði, eftirsum Samuel Johannesen framvegis var fúsur at taka móttøkuna og saltingina á seg fyri 12 ríkisdálar um mánaðin, og fólk har í økinum vóru fús at flyta saltaða fiskin til Havnar, so hvørt sum hann varð saltaður. Handilsforvaltarin ásannaði fyrimunirnar av hesum átakinum. Fiskurin av Eiði fór helst at verða eitt sindur dýrari at framleiða enn fiskurin í Álakeri, men talan var um so lítla útreiðslu í mun til fyrimunin, føroyingar fingu av hesum[415].

30. apríl skrivaði amtmaðurin aftur til forvaltaran við útkasti til, hvørjar treytir Samuel Johannesen kundi arbeiða undir, áðrenn hann varð settur í starv at taka ímóti fiski á Eiði. Handilsforvaltarin tók undir við amtmanninum og legði afturat, at tað mátti vera ábyrgdin hjá Samuel at halda bókhald yvir tað salt og annað, sum hann fekk, og við tí fiskinum, sum ikki livdi upp til góðskukrøvini[416].

414 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1277. Bræv frá Jacobæus dagfest 6. mars 1852.

415 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1356. Bræv frá handilsforvaltara Kauffeldt dagfest 4. apríl 1852.

416 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1356. Bræv frá handilsforvaltara Kauffeldt dagfest 1. mai 1852.

Samuel Johannesen tók ímóti samanlagt 18.352 pundum av stórum fiski og 3.382 pundum av smærri fiski í 1852 (Degn 1929: 24). Tað var um 8 % í mun til móttøkuna í Havn.

Tjørnuvíkingar, víkarmenn og eiðismenn heittu aftur í 1853 á sýslumannin um vegna teir at søkja um loyvi til at avreiða fisk á Eiði eins og árið fyri, og teir vildu fegnir hava, at móttøkan byrjaði so skjótt, sum til bar. Samuel Johannesen hevði boðað sýslumanninum frá, at hann vildi fegin taka ímóti og salta fisk aftur fyri somu treytir, men hann kundi ikki taka ímóti fiski frá fleiri bygdum enn teimum, sum virkaðu árið fyri, tí tað megnaði húski hansara ikki at gera[417]. Kauffeldt handilsforvaltari boðaði frá, at hann hevði einki ímóti tí, tí eingin klaga var komin um tað, og Samuel Johannesen hevði gjørt rætt og greitt upp við handilin. Hann væntaði kortini ikki, at jaktin „Fortuna" fekk tíð at koma við salti, men tað kundu útróðrarmenninir føra norður við sínum egnu bátum[418]. Úrslitið í 1853 varð, at 18.502 pund av stórum fiski og 5.685 av smáum fiski vóru avreidd á Eiði (Degn 1929: 24), og í mun til móttøkuna í Álakeri var talan um nærum 10 %.

Samuel Johannesen søkti sjálvur aftur 20. mai 1854 um at sleppa at taka ímóti fiski[419]. Tá helt Kauffeldt handilsforvaltari, at sjálvt um talan ikki var um týðandi nøgdir av fiski, og sjálvt um tað helst gav handilinum undirskot, so var einki í vegin fyri at halda fram við somu grundgevingum, sum undanfarnu tvey árini[420]. Høvdu mongdirnar ikki verið so stórar í mun til tað, sum varð avreitt í Havn hini bæði árini, so var støðan heldur øðrvísi í 1854. Hetta árið tók Samuel Johannesen ímóti 35.882 pundum av stórum fiski, og 11.250 pundum av smærri (Degn 1929: 24). Tað var 28,5 % í mun til avreiðingarnar í Havn, so helst gjørdi fiskurin á Eiði størri mun hetta árið, enn handilsforvaltarin hevði roknað við. Kortini varð hetta síðsta árið, Kongligi Einahandilin hevði ráfiskamóttøku á Eiði.

Tað er ikki eydnast mær at finna nakra orsøk til, hví virksemið steðgaði upp, men mest nærliggjandi er at hugsa, at Samuel Johannesen ella onkur annar í økinum fór at framleiða klippfisk privat í 1855. Meðan royndin hjá amtmanninum at taka ímóti ráfiski í Klaksvík miseydnaðist, vísti móttøkan á Eiði, sum sundalagsmenn sjálvir høvdu tikið stig til, at tað bar til hjá teimum at avreiða og salta fisk, sum so kundi framleiðast víðari í Havn. Torført er ikki at ímynda sær, at hetta blómandi virksemið kveikti áhugan fyri nýggju vinnuni hjá mongum, og hesin áhugin var kærkomin, nú fríhandil var á gáttini.

417 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra U, bræv nr. 276. Bræv frá sýslumanninum H.C. Müller dagfest 1. mars 1853.

418 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra U, bræv nr. 536. Brøv frá Kauffeldt handilsforvaltara og Müller sýslumanni til Dahlerup amtmann dagfest 1. mars og 28. apríl 1853.

419 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra V, bræv nr. 69. Bræv frá Samuel Johannesen dagfest á Eiði 20. mai 1854.

420 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra V, bræv nr. 69. Bræv frá handilsforvaltaranum dagfest 25. mai 1854.

### 16.1.8 Virksemið í Álakeri árini 1853-55

Eftir alt stríðið, sum hevði verið millum amtmannin og Handilsstjórnina og handilsforvaltaran í nøkur ár, gjørdist meira friðarligt, eftir at Kauffeldt var vorðin handilsforvaltari og hevði funnið seg til rættis í skipanini av virkseminum í Álakeri. Úr Danmark komu heldur eingi tekin um, at áhugi var fyri at steðga virkseminum, so síðstu árini, áðrenn Einahandilin varð avtikin, gekk tað mesta sína dagligu gongd.

Veturin 1852-53 var einki serligur, og í støðum miseydnaðist bæði vetrar- og várfiskiskapurin púrasta[421]. Seinni út á várið og um summarið var fiskiskapurin ikki stórt betri, og fólk gramdu seg um, at lítið av fiski stóð kring landið[422]. Sum summarið leið, batnaði fiskaríið kortini, og tá ið amtmaðurin skrivaði sína frágreiðing um landsins støðu á heysti, segði hann, at tað hevði verið rættiliga gott fiskarí. Sjálvt um fólk gramdu seg um, at minni fiskur var at fáa enn árið fyri, so hevði Einahandilin kortini fingið nógvan fisk[423]. Um virksemið í Álakeri er annars lítið og einki at finna í keldunum í 1853, so har hevur alt helst gingið sína jøvnu gongd.

Veturin 1853-54 var harður við nógvum stormi og frostveðri, og tað gjørdi, at tað neyvan høvdu verið 20 dagar, har til bar at rógva út. Í seinnu hálvu av apríl batnaði støðan nakað, og tá vóru einstakir dagar, har nógv varð fiskað serliga norðanfyri. Í síni frágreiðing til myndugleikarnar í Keypmannahavn var amtmaðurin eitt sindur óttafullur, tí „det feilslagne Vinter- og Vaarfiskeri har desværre havt til Følge, at Fattigfolk, hvoraf der her paa Landet, og navnlig her i Thorshavn, gives saa mange, have lidt Nød, som kun den offentlige og private Godgjørenhed i mindre Grad end det havde været ønskeligt, har kunnet afhjælpe.“[424] Summarið gjørdist betri, tí fiskaríið var sera lønandi alt summarið, og tað gjørdi sítt til at hjálpa fólki úr neyðini aftur[425].

Fyri virksemið í Ákakeri varð árið merkt av, at kona Jacobæus, Charlotte Marie Jacobæus, 31. januar andaðist einans 49 ára gomul. Hesin skelkurin gjørdi, at Jacobæus fór at drekka illa, og út á heystið gjørdist tað ein trupulleikin hjá bæði handilsforvaltaranum og amtmanninum, tí rúsdrekkatrupulleikarnir gjørdu, at Jacobæus fór at mangla pening. Bæði handilsforvaltarin og amtmaðurin fingu áheitanir um at játta honum meira løn, og onkuntíð hótti Jacobæus við, at framleiðslan fór at halda uppat, um hann ikki fekk pening.

---

421 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 177. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 20. mai 1853.

422 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 215. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 23. juli 1853.

423 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 240. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 24. september 1853.

424 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 52. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 18. mai 1854.

425 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 89. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 20. juli 1854.



*Nógvur fiskur var gjøgnum árini virkaður á økinum kring pakkhúsið, sum upprunaliga varð bygt til fiskavirkingina hjá Jacobæusi í 1845. (Mynd: Tjóðsavnið 3350F01919)*

Henda støðan gjørdi, at handilsforvaltarin skeyt upp at seta Gregersen bøkjara at taka á seg ábyrgdina av virkseminum í Álakeri. Hesa uppgávuna fekk hann 14. oktober, og eftir tað var tað Gregersen bøkjari, sum ávísti løn til starvsfólk og tryggjaði, at alt varð gjørt til lítar. Hesum tók amtmaðurin undir við, og hann boðaði Jacobæusi frá, at hereftir skuldi hann venda sær til Gregersen bøkjara, hvørja ferð honum vantaði arbeiðsfólk. Amtmaðurin ásannaði, at ein orsøk til, at framleiðslan kostaði meira í árinum, var, at arbeiðsfólk fingu hægri løn, men høvuðsorsøkin var kortini uttan iva, at Jacobæus var farin at drekka, eftir at kona hansara doyði[426].

Eftir at avtalan var gjørd við Gregersen bøkjara, hevði Jacobæus lovað amtmanninum at halda seg frá alkoholi, og amtmaðurin vónaði, at hann fór at megna at halda tað, „da han unægtelig er en duelig Fiskebereder". Av tí sama vildi amtmaðurin eisini hava, at Jacobæus slapp at halda fram í starvi sínum, um fiskamóttøka eisini fór at verða í 1855. Hækkaða arbeiðslønin gjørdu eisini, at amtmaðurin helt, at virkingarpengarnir áttu at verið hækkaðir. Arbeiðslønin var vaksin við 50 %, síðan Jacobæus varð settur í starv í 1849[427].

Kauffeldt handilsforvaltari skrivaði 8. november 1854 eina frágreiðing til Handilsstjórnina um, hvussu hevði gingist hetta árið við klippfiskaframleiðsluni.

426 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 158. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 12. desember 1854.

427 Ibid.

Hann greiddi frá, at aftur í ár lá nógv av fiskinum, sum varð innkeyptur í Álakeri, eftir sum saltfiskur, sum ikki kundi virkast fyrr enn komandi vár, og tí var roknskapurin ikki so eftirfarandi. Á „Anstalten i Aalekiær“ høvdu teir tikið ímóti 12.952 stórum fiskum og 39.777 smáfiskum, og á „Anstalten paa Bøigden Eide“ høvdu teir tikið ímóti 3.526 stórum fiskum og 5.830 smáfiskum. Tilsamans hevði handilin tí keypt 16.478 stórar fiskar og 45.607 smæri fiskar. Avskipaðir vóru 6.265 stórir fiskar og 35.880 smáir fiskar, so eftir lógu 10.218 stórir og 9.727 smærri. Avreiðingarprísurin var eisini farin upp, so stórur fiskur nú kostaði 1 1/3 skilling fyri pundið, og smærri fiskur 1 skilling. Prísurin var við øðrum orðum hækkaður við 33 %. Samanlagt vóru útreiðslurnar í Álakeri 3.431 ríkisdálar, og útreiðslurnar á Eiði vóru 769 ríkisdálar ella tilsamans 4.200 ríkisdálar[428].

Umframt tey 166 1/30 skippundini av klippfiski, sum vóru send niður í 1854, góvu tey 2.000 lispundini, sum vórðu send várið eftir, 113 ¾ skippund av klippfiski, tá ið tey vóru liðugt framleidd. Frágreiðingin hjá handilsforvaltaranum gjørdi, at amtmaðurin varð spurdur aftur um Jacobæus. Amtmaðurin svaraði, at hann hevði ikki mælt til at siga hann upp, tí at um hann megnaði at halda seg frá alkoholi, so var hann ein sera góður fiskavirkari, og hann visti ongan annan mann í oyggjunum, sum kundi átaka sær sama starv. Amtmaðurin helt heldur ikki, at tað var so stórur trupulleiki, at Jacobæus var komin at standa í skuld til handilin orskað av virkingarpeninginum, m.a. tí, at nakað av tí fór at javna seg, tá ið tey 2.000 lispundini vóru seld[429]. Handilsstjórnin takkaði fyri svarið frá amtmanninum og boðaði frá, at hon valdi at fylgja tilmælinum og geva handilsforvaltaranum boð samsvarandi tí. Tað takkaði eisini fyri, at amtmaðurin hevði bjóðað seg fram til at hava eftirlit við fiskavirkaranum[430].

1855 var tað besta árið til fiskiskap, sum fólk mintust, og tað sást eisini aftur í Álakeri, sum hevði sítt allar besta ár, tá ið talan var um nøgdir. Viðurskiftini hjá Jacobæusi tykjast eisini at vera komin í rættlag, tí einki hoyrdist til nakrar trupulleikar av hansara virksemi. Ein onnur orsøk kann sjálvandi eisini vera, at tað tíðliga var øllum pørtum greitt, at hetta fór at verða seinasta árið, Kongligi einahandilin fór at taka ímóti ráfiski og virka hann til klippfisk, og tí var eingin orsøk til at gera so nógv burturúr.

Dagin fyri, at ráfiskamóttøkan í Álakeri stongdi fyri seinastu ferð á almennum hondum, sendi amtmaðurin eitt skriv til stjórnina, har hann segði, at hann helt tað vera sjálvsagt, nú Einahandilin fór at verða avtikin um ársskiftið, at eingin ráfiskamóttøka og klippfiskaframleiðsla fór at verða, og at Jacobæus tí átti at verða sagdur úr starvi frá 1. apríl 1856 at rokna. Hesa tíðina hevði hann skyldu

428 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra V, bræv nr. 825. Avrit av brævi frá handilsforvaltaranum til Handilsstjórnina, sum var viðlagt brævi frá Handilsstjórnini dagfest 16. desember 1854.

429 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 181. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 30. januar 1855.

430 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra V, bræv nr. 1139. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 28. mars 1855.



*Fiskur á øllum Álakersbønum. Uttast til vinstru sæst endin á pakkhúsinum, har føroysk fiskavirking byrjaði av álvara. (Mynd: Tjóðsavnið 6793F11)*

til at virka tann fiskin, sum møguliga lá eftir, tá ið árið var av[431]. Hesar treytir gekk Jacobæus við til tveir mánaðir seinni[432]. Eftir 12 ár var søgan um kongligu fiskamóttøkuna og klippfiskaframleiðsluna í Álakeri, sum byrjaði í 1844, komin at enda, og eftir var eitt samfelag, sum var væl á veg inn í eina vinnuliga kollvelting.

**16.1.9 Samanumtøka**

Tá ið Einahandilin varð avtikin í 1856, hevði fiskur verið framleiddur til klippfisk í Álakeri í 12 ár. Trý tey fyrstu árini var henda framleiðsla partur av teimum kongligu fiskiroyndunum, sum greitt er frá í kapitli 13, men frá 1847 og frameftir var tað fiskur frá útróðrarmonnum, sum varð framleiddur fyri handilsins rokning. Á talvu 16.1 eru samlaðu nøgdirnar av ráfiski, sum Einahandilin keypti til framleiðsluna, savnaðar saman.

Á myndini sæst, at stórur vøkstur var árini 1848 til 1850, og at tað var átakið hjá amtmanninum í Klaksvík, sum tryggjaði, at árið 1850 gjørdist árið við størstu nøgdini av ráfiski. Árini eftir tað vóru ráfiskanøgdirnar javnari, men tær høvdu fallið nokk so væl í 1854, um móttøkan á Eiði ikki var so munagóð.

Sambært meginregluni, sum Einahandilin arbeiddi eftir, átti hesin ráfiskurin at geva ein nøgd av klippfiski, sum var ein triðing av ráfiskavektini. Verða útroknaðu

431 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra X, bræv nr. 36. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 21. august 1855.

432 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra X, bræv nr. 59. Bræv frá Kauffeldt handilsforvaltara dagfest 22. september 1855.

**Talva 16.1**




*Kelda: (Degn 1929: 24)*

**Talva 16.2.**




*Kelda: Ymisk skjøl, sum víst er til í tekstinum.*

tølini samanborin við tey veruligu útflutningstølini, sum eru funnin fram í keldutilfarinum, er nøkulunda samsvar millum tey, sum tað sæst á talvu 16.2.

Flestu árini sæst, at klippfiskaframleiðslan hevur givið heldur meir enn triðingin av ráfiskavektini, og onkur ár, t.d. í 1854, vita vit, at allur ráfiskurin ikki varð útfluttur sama ár, og tá endar veruligi útflutningurin sjálvsagt niðan fyri roknaða triðingin. Fyri árini 1852, 1853 og 1856 eru eingi verulig tøl fyri útflutta klippfiskin funnin, men samanberingin hini árini vísir, at tað ikki er heilt av leið at halda, at tey hava líkst roknaða triðinginum.

Samanlagt ber til at siga, at vøkstur var í fiskanøgdunum fram til 1850, men eftir tað minkaðu nøgdirnar nakað aftur, og vøkstur kom ikki rættiliga í aftur fyrr enn í 1855. Orsøkirnar eru helst fleiri, teirra millum náttúran og veður, men tann mótstøðan, sum var ímóti fiskavirkingini í Handilsstjórnini, tykist eisini hava havt sína týðuligu ávirkan á gongdina, og ein orsøk til, at mongdirnar ongantíð gjørdust so stórar aftur, kann hava verið, at móttøkutíðin varð avmarkað til 31. juli.

Hinvegin vísa rímiliga støðugu tølini eisini, at undirtøka var fyri klippfiska-framleiðsluni. Fleiri vóru longu bundin at inntøkuni, sum fekst í hesi nýggju vinnuni, og tí var vinnan komin fyri at verða. Einahandilin var á veg í søguna. Tí var lítil hugur har at økja um virksemið, men onnur vóru til reiðar at taka við, har Einahandilin slepti. Tað hevði alla tíðina verið eitt endamál við øllum fiskivinnuátøkunum, at føroyingar fóru at taka tey til sín. Útróðrarmenn tóku av møguleikanum at avreiða ráfisk, og tølini vísa, at 1853 gjørdist tað árið, tá ið tað endiliga eydnaðist at fáa gongd í fiskaframleiðslu á privatum hondum. At tað eydnaðist gjørdi eisini sítt til, at tørvurin ikki longur var so stórur á virkseminum í Álakeri, tí nú vóru aðrir møguleikar at velja í.

## *16.2 Klippfiskur framleiddur av privatum*

Pløyen amtmaður ásannaði um somu tíð, sum ráfiskamóttøkan byrjaði í Álakeri, at ein treyt fyri, at fiskivinnan rættiliga skuldi koma fyri seg, var, at menn sjálvir løgdu sítt fæ í virksemið og løgdu seg eftir at virka í vinnuni við lív og sál. Fiskaturkingin, sum stjórnin hevði sett í verk í Havn, eydnaðist væl, men sum frá leið væntaði hann sær ikki so nógv av almennum fyritaksemi av hesum slag, tí besti og kanska einasti háttur at avtaka Kongliga einahandilin var at virka fyri og stuðla sluppfiskiskapi, at eggja føroyingum at seta pening í, soleiðis at føroyingar fingu veingir, og miseydnaðist roynd teirra at fáa frælsi at nýta skipini, høvdu teir ikki uppiborið samhuga (Nolsøe og Jespersen 2009: 332–333).

At fáa rakstur í fiskiskip gekst illa, sum greitt er frá í kapitli 14, men ráfiska-móttøkan broytti mynstrið í útróðrinum hjá einum parti av fólkinum. Í Havn og bygdum nærhendis gjørdust útróðurin hjá nógvum ein nýggj vinna, og varð henda menningarleiðin fylgd, var næsta natúrliga stigið, at privatir eisini fóru undir at taka ímóti fiski og framleiða hann til klippfisk. Royndir vóru gjørdar

tann vegin bæði í 30-árunum og fyrst í 40-árunum, men verulig gongd kom ongantíð á. Við virkseminum í Álakeri var komin ein fyrimynd, sum vísti seg at virka, og Jacobæus fekk í instruxum sínum eisini boð um brúka framleiðsluna har sum skúla fyri áhugaðar føroyingar.

### 16.2.1 Dánjal á Steig slóðar fyri

Nakað av tíð gekk, áðrenn nakað av álvara hendi, men 10. november 1849 skrivaði Dánjal Joensen á Steig í Sandavági eina umsókn, har hann bað um loyvi til at virka klippfisk privat og senda hann við handilsins skipum fyri egna rokning. Umsóknin sær út til at hava verið kærkomin hjá Dahlerup amtmanni, tí hann skrivaði, at „det er vistnok utvivlsomt, at det er i høi Grad af Viktighed for Færøernes Opkomst, at Fiskerierne blive drevne med den størst mulige Kraft." Í viðmæli sínum lýsti amtmaðurin Dánjal sum „en af Amtets driftigste og forstandigste Bønder".

Fiskamóttøkan í Havn hevði havt við sær, at væl meira varð fiskað enn fyrr. Dahlerup hevði ferðast kring landið fyrsta heystið, hann var í Føroyum, og alla staðni hoyrdi hann eitt brennandi ynski um, at møguleikin at sleppa av við ráfiskin skuldi koma aðrastaðni í landinum. Tí ivaðist hann ikki í, at ein slíkur møguleiki fór at loysa seg fyri Einahandilin, og nú fríhandilin nærkaðist, var tað eisini ynskiligt, at íbúgvar sjálvir stóðu fyri slíkum virksemi. Í løtuni bar tað bara til, um stjórnin vildi hjálpa til[433].

Innanríkisráðið fekk umsóknina og tók eftir at hava skrivað aftur og fram við Handilsstjórnina avgerð um, at handilin framyvir skuldi taka ímóti klippfiski, sum privatir høvdu framleitt. Ráðið helt, at hetta var ein betri máti at eggja føroyingum til at leggja seg eftir at virka klippfisk enn at geva einstaklingum loyvi til at útflyta við handilsins skipum. Treytin fyri, at seljast kundi til handilin, var, at fiskurin var yvir ¾ alin, og handilin tók bara ímóti nøgdum oman fyri 1 skippund. Harumframt skuldi góðskan á fiskinum vera líka góð sum tann, sum Jacobæus framleiddi. Aftur fyri eitt skippund av góðum klippfiski skuldi framleiðarin fáa 12 ríkisdálar. Innanríkisráðið bað amtmannin kunngera hesi boðini fyri øllum[434]. Nú var í veruleikanum frítt hjá føroyingum at framleiða klippfisk. Søluprísurin lá sjálvsagt fastur, men í aðrar mátar bar nú til at royna seg sum vinnulívsmann, sjálvt um 6 ár skuldu ganga afturat, áðrenn handilin varð fríur.

Fyrsta árið við nýggja prísinum, 1850, boðaði handilsforvaltarin frá, at handilin hevði tikið ímóti millum 16 og 17 skippundum eftir hesum nýggja møguleikanum,

433 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 385. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 10. november 1849.

434 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 120. Bræv frá Innanríkisráðnum undirskrivað Rosenørn, dagfest 25. mars 1850.

og einari nógv minni nøgd eftir takstprísinum[435]. Fyrstu árini eftir tað vóru lítið frægari, og tað gekst striltið at fáa gongd í privatu framleiðsluna.

### 16.2.2 Klippfiskaframleiðsla í Suðuroy

Einki sást aftur til, um Dánjal Joensen sjálvur nýtti tann møguleikan, sum umsókn hansara var við til at lata upp fyri. Um somu tíð, sum Dánjal sendi sína umsókn, kom eisini ein onnur umsókn um nøkulunda tað sama. Hon var frá P.J. Nolsøe, sum vildi sleppa at virka klippfisk fyri handilsins rokning á Tvøroyri. Hesa umsóknina var Dahlerup ikki so glaður fyri, tí tá ið hann sendi hana víðari til Handilsstjórnina, fráráddi hann at geva honum hetta loyvið, tí „P.J. Nolsøe er et aldeles forfaldent Individ, som for Tiden ligger syg af delirium tremens“[436]. Ein onnur orsøk kann hava verið, at Poul Joensen Nolsøe var tann húskallurin, sum handilsforvaltarin hevði fingið at njósnast fyri seg um, hvat Jacobæus tókst við, soleiðis sum greitt er frá omanfyri.

Poul Joensen Nolsøe fekk ikki loyvi til at virka klippfisk fyri Einahandilin á Tvøroyri, og somu lagnu fekk fyrispurningurin hjá Johan Mortensen, faktori, tá ið hann søkti um at sleppa at taka ímóti ráfiski í Suðuroynni. Tá ið amtmaðurin ummælti umsóknina, segði hann, at sjálvt um tað hevði hansara størsta áhuga, at klippfiskavirkingin varð sett í gongd kring landið, tí tað var einasti máti at gagnnýta summarfiskin, so vóru treytirnar hjá faktor Mortensen kortini „for overdrevne til at de kunne antages.“ Við treytunum, sum Mortensen hevði sett upp, fór klippfiskurin at kosta handlinum yvir 13 ríkisdálar fyri skippundið.

Amtmaðurin ásannaði, at suðuroyingar als einki gagn fingu av klippfiskavirkingini í Álakeri, tí teir lógu so langt burturi, og tí hevði tað verið ein fyrimunur, um onkur privatur kundi virka klippfisk har, men hann helt ikki, at tað var uppgávan hjá faktorinum at gera tað. Hann mælti tí til, at umsóknin hjá Mortensen ikki varð gingin á møti, men at um onkur privatur var førur fyri at fremja ætlanin, loyvdi hann sær at spyrja, um Handilsstjórnin kundi ganga við til ein hægri prís enn árið fyri[437]. Handilsstjórnin var samd við amtmanninum, og tí varð umsóknin frá Johan Mortensen havnað. Hon helt eisini, at prísirnir vóru so vánaligir fyri tíðina á uppboðssøluni í Keypmannahavn, at tað ikki bar til at hækka prísin[438].

Stutt eftir, at Johan Mortensen fekk noktandi svar, søkti Poul Joensen Nolsøe aftur undir navninum P. Johnsen. Hesa ferð var ætlanin at keypa ráfisk sjálvur og virka hann til klippfisk, sum hann síðani kundi selja til tann, sum vildi gjalda

435 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 468. Bræv frá handilsforvaltaranum dagfest 3. desember 1850.

436 TSS. Færø Amt. Kopibók Ø, bræv nr. 397. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 21. november 1849.

437 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 65. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 7. mars 1851.

438 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 540b. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 30. apríl 1850.

besta prísin[439]. Til hesa umsókn svaraði amtmaðurin, at P. Johnsen eins og øll onnur í Føroyum hevði rætt til at keypa fisk, virka til klippfisk og selja hann til ein og hvønn í Føroyum, men tað var stangliga bannað at handla við fremmand[440]. Hann nýtti uttan iva hetta loyvið í 1851, tí í september spurdi hann seg fyri, um prísurin á klippfiskinum fór at verða tann sami, sum hann hevði verið, tí um prísurin ikki lækkaði, ætlaði hann sær at halda fram við at keypa ráfisk[441].

Átakið hjá Poul Joensen Nolsøe merktist beinanvegin í Suðuroynni, og í desember bóðu suðuroyingar Effersøe sýslumann spyrja, um prísurin eisini komandi ár fór at vera hægri, tá ið eitt skippund av klippfiski varð latið handlinum, heldur enn at fiskurin var latin inn til handilin í pundum. Sýslumaðurin legði sjálvur afturat, at hesin hægri prísurin, sum fekst við at lata stórar nøgdir av klippfiski inn, hevði fingið „i det mindste dette Syssels Beboere til at drive mere paa Fiskeriet end sædvanligt[442].

Poul Joensen Nolsøe ásannaði eisini, hvussu góðir møguleikar vóru í hesum átakinum, sum hann var farin undir, og miðjan januar 1852 bílegði hann í úthandlinum eitt tons av enskum salti úr Hetlandi. Hann vildi hava, at amtmaðurin fekk boð, so henda bíleggingin gjørdist partur av tí, sum jaktin tók heim við á ferðini í februar. Hann segði, at klippfiskavirkingin „saa meget ansporer Beboerne til at drive mere paa Fiskeriet end hid til.“ Tí vildi hann eisini hava sýslumannin at stuðla sær, tí sýslumaðurin visti „hvormeget Fiskeriets Drivt trænger til Opmuntring.“ Tess dýrari saltið var, tess minni var eftir til fiskimannin, og tí varð henda royndin gjørd at fáa bíligari salt. Í sínum viðmæli váttaði sýslumaðurin, at „Klipfisketilvirkningen her paa Øen, som er indført i afvigte Aar af Poul Joensen Nolsøe ved Tveraa og en Anden, skal have meget ansporet Beboerne til at drive Torskefiskeriet“, og tí var ynskiligt, at Poul Joensen Nolsøe fekk saltið bíligari úr Hetlandi[443].

Hesi boðini frá sýslumanninum eru greitt prógv um, at klippfiskavirkingin broytti útróðurin í Suðuroynni í 1851. Men tað var ikki lætt at ganga hesa nýggju leiðina, og alt gekst ikki eftir vild hjá Poul Joensen Nolsøe í 1852. Út á heystið gramdi hann seg um, at handilsmenninir høvdu vrakað ein part av fiskinum, tí hann ikki var nóg turrur. Harumframt segði hann, at okkurt tilfar, sum hann skuldi nýta í framleiðsluni, ikki hevði verið at fingið í úthandlinum alt summarið, og tað hevði saman við váta veðrinum gjørt tað torført at virka fiskin nóg væl. Hann óttaðist fyri, at hann ikki fór at fáa eins nógv fyri fiskin

439 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 816. Bræv frá P. Johnsen, dagfest á Tvøroyri 2. juni 1851.

440 TSS. Færø Amt. Kopibók CC, bræv nr. 936. Bræv til Skaale, Suðuroyar sýslumann dagfest 19. juni 1851.

441 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1003. Bræv frá P. Johnsen dagfest í Froðba 8. september 1851.

442 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1244. Bræv frá G. Effersøe sýslmanni dagfest í Hvalba 30. desember 1851.

443 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra T, bræv nr. 1247. Bræv frá G. Effersøe sýlsumanni dagfest í Hvalba 20. januar 1852.



*Poul Joensen Nolsøe fór í 1851 undir at taka ímóti ráfiski at virka til klippfisk. Tað fekk beinanvegin suðuroyingar til at leggja seg meir eftir at fiska, og gongd kom á eina fiskivinnu har. (Mynd: Tjóðsavnið 8833F025)*

eftir nýggjár. Tað helt hann vera óheppið, tí hann hevði hesi bæði árini skaffað nøkrum fáum bygdum 160 ríkisdálar, men undir hesum umstøðunum føldi „den Private Fiskebereder“ seg órættvíst viðfarnan, og hugurin at hjálpa hvarv[444].

Um hugurin hjá Poul Joensen Nolsøe minkaði, so vaks hann hjá øðrum, sum fylgdu aftaná, tí í 1853 vóru teir fleiri, sum fóru at virka klippfisk í Suðuroynni. Longu 2. juli komu boð frá sýslumanninum um, at nú var „complet Mangel“ upp á salt á Tvøroyri. Hetta var ein sera óheppin støða, tí um einki salt fekst til vega sum skjótast, so endaði tað við, at „Beboerne ellers maatte ophøre med de Klipfiske tilvirknings – Forsøg, hvorpaa der flere Steder var begyndt.“ Sjálvur merkti amtmaðurin álvaran aftanfyri henda tørvin á salti, tí fáar dagar eftir kom ein suðuroyarbátur allan vegin til Havnar eftir nøkrum tunnum av salti.

Handilsforvaltarin greiddi amtmanninum frá, at tað var longu sent meira salt til Suðuroyar, enn tað nakrantíð fyrr var sent í eitt heilt ár, og tí kundi Handilsstjórnin ikki ábyrgdast fyri vantandi saltið. Amtmaðurin gav handilsforvaltaranum boð um at leiga tveir stórar bátar at senda til Tvøroyrar við salti. Júst sama dag, sum bátarnir skuldu fara, kom handilsskipið „Havfruen“ á Havnina. Tað kundi fara til Suðuroyar, men amtmaðurin vildi ikki lata suðuroyingar bíða, til skipið var lossað. Umborð á „Havfruen“ var ein manning við, sum skuldi sigla eiðisjaktina „Neptunus“ til Danmarkar, og tí fekk handilsforvaltarin boð um heldur at senda

444 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra U, bræv nr. 50. Bræv frá Poul Johnsen til Dahlerup amtmann dagfest í Froðba 16. november 1852.

„Neptunus“ ein túr til Suðuroyar við salti[445]. Hesar avgerðir geva eina mynd av, at amtmaðurin var púra greiður um, hvussu stóran týdning tað hevði, at tað, sum var farið í gongd í Suðuroynni, ikki steðgaði aftur.

At fleiri í Suðuroynni privat fóru undir at framleiða klippfisk í júst 1853, samsvarar væl við tey tølini, sum eru til taks. Verða tølini yvir samlaðu nøgdina av klippfiski, sum Einahandilin útflutti, løgd aftur at tølunum í talvu 16.2, sæst, at útflutningstølini samsvara væl við framleiðslutølini hjá Einahandlinum fram til 1852, men árini 1853 til 1855 var útflutta nøgdin nógv størri enn tað, sum Einahandilin sjálvur framleiddi.

**Talva 16.3**




Í hesi talvuni er 1853 eitt greitt brot á vanliga mynstrið, og keldutilfar er til, sum greiðir frá, hvat tað var, sum lá aftan fyri hetta brotið í Suðuroynni. Tíverri siga keldurnar lítið og einki um, hvussu gongdin var aðrastaðni í landinum, men hugsandi er, at hon í størri og minni mun hevur líkst gongdini í Suðuroynni. Í hvussu er varð úrslitið, at mongdin av privat framleiddum klippfiski longu í 1854 var nærum tríggjar ferðir størri enn mongdin, sum varð framleidd í Álakeri.

### 16.2.3 Skibsted roynir seg við klippfiski

Í partinum 14.3.1 er greitt frá virkseminum hjá Skibsted, og at amtmaðurin roknaði hann sum einasta kappingarneytan hjá Einahandlinum. Henda støða hansara gjørdi, at havnarfólk høvdu ein annan møguleika, tá ið Einahandilin ikki nøktaði tørvin. Ein slík støða kom í, tá ið Einahandilin og amtmaðurin í

445 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 213. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 20. juli 1853.

1852 avgjørdu at stytta um móttøkutíðina, og spurningurin varð, um onkur annar kundi taka ímóti fiski í augustmánaði. Ta uppgávuna tók Skibsted á seg í 1853, tá ið hann fór at taka ímóti eitt sindur av fiski frá havnarmonnum[446].

Skibsted bað í august 1853 amtmannin um loyvi til at senda klippfisk við handilsins skipum sum sendingsgóðs, og í oktober fekk amtmaðurin eina líknandi áheitan frá fleiri havnarmonnum. Amtmaðurin roknaði við, at samband var millum fyrispurningin hjá Skibsted og hesa áheitanina frá havnarmonnum, „for jeg troer ikke, at nogen anden heroppe vilde indlade sig paa et saadant Forsøg." Hann vísti á, at tað nærum ongantíð var eydnast at virka góðan klippfisk burtur úr ráfiskinum, sum kom á land í august. At tað skuldi gangast betur hjá privatum at virka henda fiskin

> er der ikke Skygge af Grund til at antage. Der ere for Tiden flere, som virke Klipfisk her paa Landet, og som derpaa sælge den tilvirkede Fisk til Handlen, kunne de finde deres Regning ved at gjøre saadant med den i de andre Maaneder fangede Fisk, indser jeg ikke, hvorfor de da ikke skulde kunne handle ligedan med hensyn til den i August Maaned fangede Fisk, dersom den kunde tilvirkes.

Aftur her er eitt prógv um, at verulig gongd kom á privatu framleiðsluna av klippfiski í 1853, og henda framleiðsla gjørdi tað eitt sindur lættari hjá amtmanninum at taka støðu, tá ið eitt nú Skibsted royndi at brúka óhepnu støðuna, havnarmenn vóru endaðir í, sum jarnbrot til at seta fleiri hol á einahandilsmúrin. Nú gongd var á privatu framleiðsluni kundi amtmaðurin svara, at hann helt, at tað fór at verða ógjørligt at hava eftirlit við, um tað bara var fiskur, sum loyvishavarin sjálvur hevði virkað, sum varð sendur niður, um eitt tílíkt loyvi varð givið. Hann óttaðist fyri, at eitt slíkt misbrúk fór at merkja tap fyri handilin, og tað fór eisini at vera úrslitið av møguleikanum at senda henda fisk sum sendingsgóðs. Tí mælti hann til ikki at ganga umsóknini á møti[447], og tá var lætt hjá Handilsstjórnini eisini at siga, at heldur ikki hon sá nakra grundgeving fyri at ganga við til hesa umsókn[448].

Hvussu gekst við fiskinum hjá Skibsted í 1853, er óvist, men hann royndi seg aftur í 1854. Tá noyddist hann at ásanna, at tað var alt annað enn lætt at virka fisk í august, tí 29. august bað hann amtmannin geva sær loyvi til at senda 25 tunnur av saltfiski við síni egnu jakt, tí veðrið hevði verið so óstøðugt, at hann óttaðist fyri, at fiskurin fór at spillast, um hann helt fram við royndunum at virka hann til klippfisk[449].

---

446 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 187. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 13. september 1851.

447 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra U, bræv nr. 1641. Avrit av brævi til Handilsstjórnina dagfest 12. oktober 1853. Er eisini í Kopibók EE, nr. 251.

448 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra U, bræv nr. 1641. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 18. mars 1854.

449 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra V, bræv nr. 476. Bræv frá Skibsted dagfest 29. august 1854.



*Skibsted fór í 1853 at taka ímóti ráfiski frá havnarmonnum, tí Einahandilin ikki vildi taka ímóti fiskinum í augustmánaði. Á myndini er pakkhúsið hjá Skibsted uttast til høgru, og pakkhúsið hjá Einahandlinum er uttast til vinstru. Fiskastakkar standa við bæði húsini.*
*(Mynd: Tjóðsavnið 5207F89.054)*

Nógvur smáfiskur hevði verið at fingið, síðani ráfiskamóttøkan í Álakeri læt aftur, og teir, sum høvdu lagt seg eftir at keypa henda fisk fyri at royna at virka hann til klippfisk, komu illa fyri, tí hesar royndir eydnaðust ikki væl, tí tað var áhaldandi regn, og hesir menn høvdu nú bara valið ímillum at senda fiskin saltaðan á marknaðin ella at goyma hann til komandi vár. Skibsted hevði sítt egna skip, og tí lá væl fyri hjá honum at senda fiskin av landinum. Saltaður fiskur var ikki takstvøra, og tí skuldi hann sendast sum sendingsgóðs, men einki pláss var fyri honum umborð á handilsskipunum. Amtmaðurin vildi tí ikki nokta Skibsted at taka sín fisk til Danmarkar við egnum skipi, men hann ivaðist í, um Skibsted megnaði at konservera fiskin á ferðini og í øðrum lagi um hann slapp av við slíkan fisk, og tí mælti hann eisini til, at hann slapp undan fraktgjaldi[450].

Aftur í 1855 tók Skibsted ímóti fiski, og hann sendi 7 skippund av klippfiski við skipi sínum[451]. Harumframt hevði hann 15 tunnur av saltaðum fiski, sum hann hevði keypt í august, og hann bað tí um, at hesar tunnur kundu fara við skipinum á sama hátt sum árið fyri[452]. Soleiðis gjørdi hugurin hjá Skibsted at

450 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 108. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 20. september 1854.

451 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra X, bræv nr. 14. Bræv frá Skibsted dagfest 25. august 1855.

452 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra X, bræv nr. 15. Bræv frá Skibsted dagfest 25. august 1855.

hjálpa havnarmonnum, at gongd kom á fiskaframleiðsluna, áðrenn Einahandlin varð avtikin, og hesar royndir mundu koma væl við, tá ið fyritøka hansara skuldi virka víðari á frælsa marknaðinum, sum kom 1. januar 1856.

**16.2.4 H.C. Müller sýslumaður tekur móti fiski um veturin**

Fyri teir fátøku útróðrarmenninar í Havn var tað framvegis ein trupulleiki, at ongin møguleiki var at avreiða fisk um veturin. Sýslumaðurin H.C. Müller hevði skyldu til at fylgja við í, hvussu støðan var hjá fólki í sýsluni, og hann mundi tí vera ein av teimum, sum kendi allarbest til torføru umstøðurnar hjá havnarfólki. Longu í oktober 1847 ásannaði hann, at íbúgvarnir í syðra parti av sýsluni høvdu „leveret et ikke ubetydeligt Quantum Raafisk, og saa meget som muligt benyttet denne gavnlige Foranstaltning." (Guttesen (edit.) 2010: 36), men veturin 1848-49 miseydnaðist útróðurin, og sýslumaðurin sá, at „det har derfor været en overordentlig trang Tid for den Klasse Indbyggere der for størstedelen lever af Fiskeri." (Guttesen (edit.) 2010: 40) Týdningurin av fiskamóttøkuni í Álakeri kom eisini til sjóndar í 1850, tá lítið hevði komið burtur úr fiskiskapinum, „hvis ikke den gavnlige Foranstaltning med Raafiskens Modtagelse i Thorshavn havde existeret." (Guttesen (edit.) 2010: 46).

Veturin 1853-54 var veðrið so ólagaligt, at tað bara bar til at fara til útróðrar í eini 10 dagar. Avleiðingin var, at „en Del af Almuen, der lever fornemmelig af Fiskerie, har lidt og lider endnu stor Nød." (Guttesen (edit.) 2010: 53). Lítið er at ivast í, at tað var henda neyðin, sum fekk hann til at fara undir at taka ímóti fiski henda veturin, sum hann so ætlaði at virka, tá ið veður aftur varð til tað.

Fyri at fáa hesa ætlan at eydnast spurdi hann amtmannin, um til bar at hækka prísin á klippfiski, og í øðrum lagi um hann kundi sleppa at senda fisk við handilsins skipum fyri egna rokning. Amtmaðurin ásannaði, at tey flestu av teimum 950 fólkunum í Havn vóru dagleigarar og útróðrarmenn, sum livdu av tí, sum fekst úr havinum. Hesi fátøku fólkini høvdu ikki lætt við at framleiða turran fisk, tí at tey ikki høvdu pláss til tað, og tey megnaðu heldur ikki at binda inntøkuna frá fiskinum í so langa tíð, sum kravdist at turka hann. Tí var høvuðsvinnuvegur teirra ráfiskur. Tað, sum Müller var farin undir, var tí „en sand Velgjerning imod dem, at skaffe dem afsætning paa deres raa Fisk, for at de derved kunne blive satte i stand til at kjøbe, hvad de ellers behøve til deres Livs Ophold."

Men henda ætlanin var ótrygg, tí vandi var fyri, at fiskurin spiltist, ella at hann fór at síggja minni góður út, meðan hann lá fyri veturin. Tí var tapsvandin stórur, og tí hevði tað týdning, at tað slapst av við fiskin beinanvegin um várið, ella at tað bar til at føra hann á marknaðin, áðrenn íslendski og norski fiskurin kom á marknað. Amtmaðurin fegnaðist um tiltakið hjá Müller, tí hann helt, at „det Foretagende, som Sysselmand Müller har paabegyndt, er en Velgjerning imod Thorshavnerne, og i betragtning heraf skal jeg tillade mig at anbefale ham til al den Begunstigelse i den ansøgte Retning, som der maatte kunne tilstaaes



*H.C. Müller, sýslumaður, fór veturin 1853-54 at taka ímóti fiski frá havnarfólki, so tey fingu pening at gjalda fyri neyðsynjarvørur. Á myndini situr hann saman við konuni Marin. (Mynd: Tjóðsavnið 4243F0000032)*

ham."[453] Handilsstjórnin svaraði 20. mars 1854, at prísurin á klippfiski í nýggja takstinum var 1 skilling hægri pr. pund, enn hann hevði verið í 1853, og tí helt hon, at umsóknin í veruleikanum longu var gingin á møti[454].

Hvussu tað gekst við fiskaframleiðsluni hjá sýslumanninum, vita keldurnar einki at siga um, men tann trupulleikin, hann royndi at loysa, vísti púra greitt, at havnarfólk í stóran mun longu livdu av at avreiða ráfisk til víðari framleiðslu. Við búskaparligum orðum ber helst til at siga, at útboðið av ráfiski var stórt, og tað sama var við eftirspurninginum eftir onkrum at framleiða fiskin til klippfisk. Tí vóru umstøðurnar hjá teimum, sum átóku sær hesa uppgávuna, eisini góðar, og tað mundi gera sítt til, at verulig gongd kom á privatu framleiðsluna hesi árini.

### 16.2.5 Vøra úr havinum størri týdning enn landbúnaður

Við keldugrundarlagnum, sum er tókt, sæst, at gongd var komin á privata fiskaframleiðslu bæði í Suðuroynni og í Havn í 1853, og tølini geva eina greiða ábending um, at tað sama var hent aðra staðni í landinum um somu tíð.

Henda gongdin helt fram árið eftir, og so nógv gongd var í virkseminum, at longu í juli 1854 var lítið salt eftir í handlinum. Vandi var fyri, at saltið fór at verða uppi, áðrenn handilsskipini komu aftur úr Keypmannahavn, og hendi tað,

453 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 13. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 24. januar 1854.

454 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra U, bræv nr. 1652. Bræv frá Handilsstjórnini dagfest 20. mars 1854.

kundi tað enda við, at øll tann privata framleiðslan steðgaði upp. Tí avgjørdi handilsforvaltarin at senda jaktina „Fortunu" til Hetlands eftir salti. Hansara grundgeving var, at „Beboerne have iaar i et meget større Omfang end noget af de foregaaende Aar begyndt at virke Klipfisk. Paa Grund heraf er Forbruget af Salt ogsaa betydeligt blevet forøget."

Fiskaríið hetta summarið hevði verið „særdeles godt" flestu staðni í landinum, og tí var tað ein stórur fyrimunur serliga fyri fólk í bygdum, sum ikki høvdu góðan møguleika at flyta fiskin til Havnar, at privatir nú vóru farnir at framleiða henda summarfiskin til handilsvøru. Sjálvt um handilin hevði fingið meir salt, enn vanligt hevði verið undanfarin ár, var eftirspurningurin vaksin uppaftur meira, enn roknað var við, og tí tók amtmaðurin eisini undir við avgerð handilsforvaltarans[455].

Í heystfrágreiðing síni um landsins støðu staðfesti amtmaðurin, at fiskiskapurin hevði verið sera góður, og nógv varð fiskað hetta summarið. Orsøkin var ikki bara, at nógvur fiskur var at fáa, tí batnaðu møguleikarnir at fáa pening fyri fiskin gjørdu eisini sítt til, at so nógv meir varð fiskað. Amtmaðurin segði, at „der paa forskellige Øer af private Mænd i Sommer er blevet gjort Indkjøb af raa Fisk, som de Vedkommende have ladet virke til Klipfisk til Salg i Handelen." Fyri hann var tað at fegnast um, at „Befolkningen er kommen til Erkjendelse af, at det meget godt kan betale sig, at virke Klipfisk for privat Regning til Salg til Handelen." Hesir undangongumenninir fingu kortini tann trupulleikan, at veðrið ikki varð til vildar til framleiðsluna frá august og frameftir, og tí fór helst væl at fiski at liggja eftir hálvvirkaður til komandi vár. Teir, sum høvdu brúkt munandi upphæddir upp á at keypa ráfisk, vóru eisini komnir í eina torføra støðu, um saltmangul hevði verið hetta summarið, og tí var tað so umráðandi at taka stig til at forða fyri tí[456].

Aftur í 1855 var nógvur fiskur at fáa, og fiskaríið var „ganske særdeles heldigt, og det i en saadan Grad, at man ikke erindrer noget Aar, der har givet et bedre Udbytte." Náttúran spældi við, nú verulig gongd var komin á privatu fiskavirkingina, og tað gjørdi, at uppaftur fleiri høvdu lagt seg eftir at virka klippfiskin privat. Tí vaks saltnýtslan aftur í 1855 nógv meir, enn Handilsstjórnin hevði lagt upp fyri, og vandi var aftur fyri, at saltið bleiv uppi. Loysnin var enn eina ferð at senda jaktina til Hetlands eftir meira salti[457].

Meðan framgongdin var stór í fiskivinnuni, var støðan øðrvísi í landbúnaðinum. Veturin 1854-55 var harður, og harumframt var prísurin á innfluttum vørum hægri í handlinum, enn hann hevði verið nakrantíð áður. Tí vónaði amtmaðurin, at góði fiskiskapurin fór at bøta nakað um minkandi inntøkuna úr

455 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 91. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 20. juli 1854.

456 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 138. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 7. november 1854.

457 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 233. Bræv til Handilsstjórnina dagfest 26. juni 1855.



*Liðugt virkaður klippfiskur verður lagdur inn í pakkhús. Í bátinum leggja kvinnur fiskin í kurvar. Høgrumegin tekur ein maður ímóti kurvini, sum síðani verður handað víðari upp og inn í pakkhúsið. Aftanfyri koma menn rógvandi við næsta bátinum. (Mynd: Tjóðsavnið 3350F02619)*

landbúnaðinum[458]. Heystið var eisini hart fyri landbúnaðin, men fiskiskapurin hevði sum heild verið frálíkur, og prísurin á bæði turrum fiski og klippfiski var høgur, so nógv inntøka hevði verið at fingið burtur úr fiskinum[459]. Støðan versnaði ikki longur út á heystið, tí í desember skrivaði amtmaðurin, at „Fiskeriet har i de sidste Maaneder været overmaade rigeligt, og der er saavel omkring Landet, som inde i Fjordene fisket en betydelig Deel Torsk.“[460] Góði fiskiskapurin helt fram allan veturin, og amtmaðurin roknaði við, at munandi nøgdir av turrum fiski fóru at verða seldar til Einahandilin, so leingi sum hann var virkin, tí higartil høvdu teir fáu spekulanthandilsmenninir, sum høvdu vitjað, ikki víst áhuga fyri hesi handilsvøruni[461].

Fiskivinnan var væl á veg at taka seg fram um landbúnaðin sum týdningarmiklasti vinnuvegur í Føroyum, og gitt hevur verið, at fiskaútflutningur saman við lýsi í 1855 helst var hægri enn samlaða virðið á útfluttum landbúnaðarvørum

458 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 237. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 9. juli 1855.

459 TSS. Færø Amt. Kopibók KK, bræv nr. 16. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 24. september 1855.

460 TSS. Færø Amt. Kopibók KK, bræv nr. 23. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 8. desember 1855.

461 TSS. Færø Amt. Kopibók KK, bræv nr. 72. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 29. apríl 1856.

(Nolsøe og Jespersen 2009: 330). Full ferð var við øðrum orðum á umskiftinum í búskapinum frá landbúnaði til fiskivinnu, áðrenn Einahandilin varð avtikin.

Tíverri er ilt er at siga, hvørjir privatu framleiðararnir av klippfiski vóru, og hvussu stóran týdning teir hvør í sær høvdu fyri tey økini av landinum, sum teir virkaðu í. Í teimum mongu bygdarsøgunum, sum tøkar eru um nógvar av bygdunum í Føroyum, sæst einki til hetta evnið, og tað er eitt greitt tekin um, at vanliga fatanin av, at avtøkan av Einahandlinum var byrjanin til alt vinnuligt virksemi í landinum, hevur gjørt, at søgan um byrjanina til klippfiskaframleiðsluna er dottin burtur ímillum. Lítil ivi man vera um, at tær royndirnar, sum hesir privatu framleiðararnir fingu, gjørdi sítt til, at teir vóru betur fyrireikaðir at taka við fríhandlinum, tá ið hann kom, og at fleiri av teimum tí vóru millum teir fyrstu, sum søktu um at fáa handilsloyvi, tá ið fríhandilin endiliga gjørdist veruleiki 1. januar 1856.

## *16.3 Samandráttur*

Tá ið tað var greitt, at kongligu fiskiroyndirnar vóru steðgaðar, og Rentukamarið hevði mist trúnna á eini komandi fiskivinnu í Føroyum, var vandi fyri, at tann avreiðingarmøguleikin, sum nógvir útróðrarmenn høvdu tikið væl ímóti, fór at hvørva aftur. Tað hendi ikki, tí at Rentukamarið valdi, at Jacobæus skuldi halda fram í starvi sínum fram til 1. november 1848.

Meðan Jacobæus tók ímóti fiski í 1848 á sama hátt, sum hann hevði gjørt síðstu árini, hendu stórar broytingar aðrastaðni. Í Danmark var einaveldið skift út við fólkaræði, og nýggja Innanríkisráðið tók við teimum føroysku málunum, sum Rentukamarið hevði umsitið. Pløyen amtmaður, sum íðin hevði stríðst fyri at fáa gongd á eina fiskivinnu, var valdur at umboða Føroyar á Grundlógartingi, og hann kom ongantíð aftur til landið. Í hansara stað kom Carl Emil Dahlerup til Føroya sum nýggjur amtmaður á sumri 1849.

Mitt í øllum hesum umfatandi broytingunum skuldi eisini klippfiskavirksemið í Álakeri umskipast. Avgjørt varð, at Einahandilin skuldi halda fram at reka klippfiskaframleiðsluna, og at amtmaðurin og handilsforvaltarin í felag skuldu taka tær avgerðir, sum takast skuldu hesari framleiðsluni viðvíkjandi. At amtmaðurin fekk so stóra ávirkan á virksemið í Álakeri, vísti seg at vera ein heppin avgerð, tí bæði handilsforvaltarin og Handilsstjórnin vildu helst sleppa av við tað, tí tað gav undirskot og gjørdi seg inn á ta ekstraktivu skipanina, sum Einahandilin var so stórur partur av.

Serliga árið 1850 var merkt av ósemju millum amtmannin og teir, sum varðaðu av handlinum. Meðan amtmaðurin sá stórar møguleikar fyri samfelagsmenning í fiskaframleiðsluni, sá Handilsstjórnin bara eitt vaksandi undirskot fyri sær, og fleiri ósemjur stóðust av, at annar parturin vildi koyra frameftir, meðan hin heldur vildi bakka. Endin á hesum stríðnum varð, at gamli handilsforvaltarin

segði seg úr starvi. Amtmaðurin hevði vunnið ein sigur, og fiskaframleiðslan slapp at halda fram at leggja lunnar undir eina nýggja tíð.

Eftir ósemjurnar var lítil vøkstur í klippfiskaframleiðsluni hjá Einahandlinum, men virksemið kveikti áhugan hjá privatum at fara undir klippfiskaframleiðslu, og tað sást av álvara aftur í 1853. Tá vóru teir so nógvir, sum tóku av møguleikanum at keypa ráfisk frá útróðrarmonnum, framleiða hann til klippfisk og selja hann til Einahandilin, at privata framleiðslan longu sama ár var líka stór sum tann almenna. Royndir hjá fleiri amtmonnum at kveikja áhugan fyri fiskivinnuni bóru endiliga ávøkstur. Fleiri og fleiri føroyingar sóu teir møguleikarnar, sum amtmaðurin hevði stríðst fyri, gongd var komin á menningina av Føroyum sum fiskivinnusamfelag, og nú fór at verða torført at steðga hesi gongdini aftur.

# 17. kapittul
# Mótstøðan móti fiskivinnuni minkar og fellur

Sum hvørt, sum klippfiskavirkingin øktist, fekk hon alsamt størri og størri týdning, tí tey gjørdust fleiri og fleiri, sum í stóran mun livdu av hesum nýggja møguleikanum. Samstundis gjørdi vøksturin í nýggju fiskivinnuni, at tey, sum hildu seg til siðbundnu vinnuna í siðbundna samfelagnum, føldu seg alsamt meira og meira hótt. Men nýggju møguleikarnir fingu eisini so líðandi fleiri fortalarar í Føroyum, og tá ið privatir av álvara fóru undir at framleiða klippfisk í 1853, gjørdi tað helst, at amtmaðurin kundi brúka sítt vald til at stuðla teimum heldur enn sjálvur at ganga á odda.

Um júst somu tíð sum gongd av álvara kom á nýggju fiskivinnuna, varð Løgtingið endurstovnað, og tað merkti, at føroyingar fingu ein stovn at bera fram sínar hugsanir í, so frá 1852 er eitt sindur betri keldugrundarlag til taks at greiða frá, hvat føroyingar sjálvir hildu um m.a. nýggju fiskivinnuna. Á Løgtingi tók hvast orðaskifti tók seg upp millum tey, sum stuðlaðu nýggju møguleikunum, eins og amtmaðurin hevði gjørt, og tey, sum vildu halda fast við tað gamla. At síggja til snúði orðaskiftið seg um línufiskiskap og tað agnið, sum skuldi brúkast á línuni, men aftan fyri hetta kjakið liggur hugurin at verja gamla samfelagið móti øllum nýggjum rákum. Hetta orðaskiftið er tí á ein hátt seinasti bardagin fyri at halda fast í innara partinum av javnvágsfelluni, sum nú var tað einasta, sum var eftir av felluni, eftir at øll tann politiska skipanin í Danmark var kollvelt.

Í hesum partinum verður hesin áralangi orðadrátturin lýstur í hesum ljósi, og roynt verður at finna fram til, hvussu undirtøka fekst millum føroyingar fyri nýggju fiskivinnuni, sum amtmenn so leingi høvdu roynt at fingið gongd á.

## 17.1 Avreiðingarmøguleikin lívstreyt hjá teimum fátæku

Tá ið Jacobæus fór undir at framleiða klippfisk í Álakeri, var hetta ein kærkomin inntøkumøguleiki hjá havnarfólki, og tá ið hetta virksemið eisini varð víðkað til, at útróðrarmenn kundu avreiða fisk sín til framleiðsluna, øktust fyrimunirnir enn meira. Nógv bendir á, at hesir nýggju inntøkumøguleikarnir eftir stuttari tíð gjørdust høvuðsinntøkugrundarlag hjá fleiri familjum í Havn, og við tíðini fór tað at merkjast alsamt betur, tá ið upp- og niðurgongd í fiskiskapinum beinleiðis avgjørdi, um fólk livdu í neyð ella við einari relativari vælferð.

Tey, sum búðu í Havn, vóru fyri tað mesta ognarleys, og fleiri av teimum vóru slík, sum pláss ikki var fyri í væl skipaðu bygdasamfeløgunum. Tey royndu tí longu frammanundan fiskivinnuni at vinna til lívsins uppihald uttan fyri karmarnar á gamla samfelagnum, og tí vóru tey eisini beinanvegin til reiðar, tá ið nýggir vinnumøguleikar komu. Økt inntøkugrundarlag gjørdi beinanvegin, at henda ognarleysa stættin í Havn vaks, og tað, at henda vaksandi stættin var púra bundin at nýggju møguleikunum, gjørdi sítt til at økja um undirtøkuna fyri nýggju vinnumøguleikunum.

Tá ið Dahlerup kom til Føroya sum amtmaður í 1849, sá hann beinanvegin, at fiskavirkingin var til „overmaade stor Fordel for den fattigste Deel af Befolkningen.“[462] Hesin fátækasti parturin av fólkinum livdi javnan á markinum til hungursneyð, og tað sást millum annað, tá kornprísirnir hækkaðu. Tað hendi í 1851, og tá fekk tað fleiri havnarfólk at senda eina áheitan til myndugleikarnar um at sleppa at keypa kornvørur fyri ein lægri takstprís. Amtmaðurin greiddi frá, at trýstið av prísinum føldist ikki so hart, tá ið inntøkan var góð, men inntøkan gjørdist ongantíð so góð, at høgur prísur ikki ávirkaði støðuna hjá fátæku almúguni[463].

Í várfrágreiðing síni árið eftir, í 1852, segði amtmaðurin, at sera nógvur seiður hevði verið at fingið, og tað kom væl við hjá fátøku fólkunum í Havn,[464] men fólk fingu kortini ein hvøkk, tá ið nýggu takstprísirnir komu fyri árið, tí prísurin var farin uppaftur longri upp. Amtmaðurin fekk umsókn frá havnarfólki, sum vóru umboðað av Pól í Geil, og tjørnuvíkingum, sum Andreas Jacob-Zachariassen umboðaði, um at fáa lægri prísir á korni. Í sínum viðmerkingum til hetta málið greiddi amtmaðurin Innanríkisráðnum frá, at „den menige Mand, der ikke kan sætte sig ind i Handels-Forhold og som nærmest betragter den kongelige Handel som en Forsørgelsesanstalt,“ fataði ikki, hvussu kornprísurin kundi fara so langt upp. Hann visti eisini at siga, at „dersom Fiskeriet ikke skal lykkes beder, end det hidtil iaar har gjort, og dersom Landet ikke bliver velsignet med heldigere Grindefangster end det har været sidstforløbne Aar, vil det vistnok falde meget vanskeligt for en saare stor Mængde af den herværende fattige Befolkning, at erhverve det fornødne til Livets Ophold.“[465]. Fiskur og grind var tað einasta, sum kundi forða fyri hungursneyð.

Veturin 1852-53 var fiskiskapurin eisini so vánaligur, at amtmaðurin helt, at tað vóru „slette Udsigter for Fattigfolk“ [466], og sum greitt er frá í kapitli 16.2.4, gjørdi líknandi neyð veturin 1853-54, at privatir fóru undir at keypa ráfisk til víðari framleiðslu størri part av árinum, enn Kongligi handilin gjørdi. Tann næsta veturin, 1854-55, var eisini torført at rógva út, og støðan gjørdist so álvarsom

462 TSS. Færø Amt. Kopibók KK, bræv nr. 212. Bræv til Løgmálaráðið dagfest 31. juli 1857.
463 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 153. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 12. juli 1851.
464 TSS. Færø Amt. Kopibók BB, bræv nr. 287. Bræv um Landets Tilstand til Innanríkisráðið dagfest 27. apríl 1852.
465 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 7. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 21. juni 1852.
466 TSS. Færø Amt. Kopibók EE, bræv nr. 177. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 20. mai 1853.

fyri tey fátøku, at amtmaðurin tók stig til at senda eina frágreiðing um støðuna til Innanríkisráðið í januar 1855. Hann segði, at tað hevði verið stormur næstan allan november og desember og 8 teir fyrstu dagarnar av januarmánaði við frosti og kava. Ongin møguleiki hevði verið at rógva út. „Fattige Folk, hvoraf der desværre gives saa umaadelig mange her, lide paa Grund deraf megen Nød."

Neyðin var so stór, at vælgerðartiltøk bara megnaðu at minka um pínuna í stutt tíðarskeið. Tíbetur broyttist veðrið tá, og komandi 14 dagarnar var stilt og pent veður, „saa at Folk næsten hver Dag have kunnet gaae paa Fiskeri; og da der overalt er blevet fisket ganske særdeles godt, tror jeg at man tør antage, at enhver Fattig, der kan og vil arbeide, nu ikke længer bør kunne savne, hvad han behøver til sit og sines Underholdning."[467]

Fiskurin gjørdi góðan mun at haldi neyðini burtur, men hann hjálpti bara, so leingi nakað var at fáa. Tveir mánaðir seinni, í mars 1855, boðaði amtmaðurin Innanríkisráðnum frá, at sjálvt um veðrið síðstu mánaðirnar hevði verið so gott, at tað lá væl fyri at rógva út, og tað í heila tikið hevði verið góður fiskiskapur, so „har der ikke i mange Aar været saa megen Nød og Usselhed her paa Landet, som der i Vinter har været og endnu er her." Ein orsøk var, at lítið var av grind í 1854, og seyðurin hevði givið minni av ull og kjøti, enn vanligt var. Harumframt komu so teir óvanliga høgu prísirnir á kornvørum[468].

Sjálvt um amtmaðurin kendi til støðuna hjá fátæka partinum av fólkinum, man tað hava verið svárt hjá honum at fáa ta áheitanina, sum 28 havnarborgarar skrivaðu 20. mars 1855. Í áheitanini siga hesi fólk, at støðan var alt annað enn góð í býnum, tí her hevði „ikke i over Mands Minde været saa trange Tider som der nu har været og endnu er." Í Havn var havið so at siga einasta hjálp, men fiskivinnan hevði ikki givið nógv síðstu tíðina, tí hvørki hýsa ella seiður hevði verið at fingið, og veðrið hevði verið ein stór forðing fyri fiskingini. Tað var tí sjálvsagt, at „der maa være stor Mangel; og naar hertil kommer den høie Priis, hvori Nødvendighedsvarerne staar ved Handelen, vil denne Mangel udarte til Nød, og dette er virkeligen Tilfældet for Øieblikket." Tey vildu tí hava amtmannin at hjálpa sær, og serliga vildu tey hava korn, sum tey so kundu gjalda aftur seinni, „da vi ellers med Familie ikke ser nogen Udvei til at kunne friste Livet."[469]

Tað tykist greitt, at hesi fólkini vóru púra bundin av at fáa pening inn við at selja ráfisk, sum tey so kundu keypa fyri í handlinum, og rakk peningurin ikki til tað, sum kravdist, var neyðin í durinum. Ein fátækranevnd var, hvørs endamál var at taka sær av fátøkum fólki, men hon formáddi sær lítið, tá ið talan gjørdist um, at heilir samfelagsbólkar komu í neyð. Um hesa støðuna hjá havnarfólki segði nevndin, at neyðin var stór í býnum, og at nevndin hevði longu nýtt

467 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 178. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 25. januar 1855.

468 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 203. Bræv til Innanríkisráðið um landsins støðu dagfest 4. mars 1855.

469 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra V, nr. 974. Bræv frá 28 havnarborgarum dagfest 20. mars 1855.





*Í 1855 vóru havnarfólk so bundin av inntøkuni frá fiskaavreiðing og fiskaarbeiði, at sveik fiskurin, var hungursneyðin ikki langt burturi. 20. mars 1855 skrivaðu 28 borgarar í Havn undir uppá, at tey ikki sóu sær nakran møguleika fyri at yvirliva, um fiskur ikki skjótt fór at verða at fáa aftur.*

væl meir pening, enn hon plagdi. Hon hevði tí ikki umstøður at hjálpa við so nógvum meira, men um støðan gjørdi, at hon skuldi gera tað, so skuldu størri inntøkur finnast til nevndina. Nevndin helt eisini, at besta loysnin var at finna arbeiðspláss, tí nógv av hesum fólkunum høvdu einki at gera[470].

Soleiðis var ein samfelagsstætt í hvussu er í Havn vorðin bundin av inntøkumøguleikunum í nýggju fiskivinnuni, longu áðrenn Einahandilin varð avtikin, og lítið er at ivast í, at tað sama gjørdi seg galdandi kring landið, sjálvt um talan ikki var um so stórt tal av fólki í hvørjari bygd sær. Hesi fólkini og umstøður teirra gjørdu í sjálvum sær, at neyðugt var hjá myndugleikunum at hjúkla um møguleikar teirra at liva av fiskivinnu, og sjálvur fór hesin samfelagsstættur at berjast tað, hann var mentur, at verja og menna um sítt nýggja tilverugrundarlag.

## *17.2 Mótstøðan móti línuni tekur seg upp*

Nýggju møguleikarnir at avreiða ráfisk gjørdu, at nakrir menn løgdu seg eftir at gera meira við fiskiskapin, meðan aðrir hildu fram á sama hátt, sum gjørt hevði verið í øldir. Teir, sum valdu at gera meira burtur úr fiskiskapinum, tóku nýggj amboð og fiskihættir til sín og sleptu samstundis gomlum siðvenjum. Ítøkiliga merktist hesin munurin serliga í, at nakrir fóru at fiska við línu, meðan aðrir hildu fram við aldagamla snørisfiskiskapinum.

Teir, sum fiskaðu við línu, funnu skjótt út av, at tað javnan var meira fiskur at fáa um náttina enn um dagin, og í mai 1848 greiddi Schrøter prestur í brævi frá, at fiskiskapurin var nógv betri um náttina enn um dagin. Júst ta náttina hevði ein útróðrarmaður fingið 82 stórar toskar við línu millum Toftir og Strendur, og fiskaturkarin í Havn hevði ongantíð sæð so feitar toskar hesa ársins tíð fyrr (Nolsøe og Jespersen 2009: 323).

### 17.2.1 Fuglfirðingar savna undirskriftir at mótmæla línufiskiskapi

Hetta við at fiska um náttina órógvaði aðrar, sum vildu halda fast við tað gamla, og 10. juli 1847 settu tveir fuglfirðingar, Peder Pedersen og Sigvard Pedersen, saman eitt skriv, har teir mótmæltu náttarfiskingini, sum síðstu árini hevði tikið seg upp á Norðhavinum. Í brævinum søgdu teir, at tað var teirra „Overbevisning, at det for kort siden paabegyndte, men alt mere og mere sig udbredende Nattfiskeri paa Nordhavet, fornemmelig i Vaarfisketiden er baade skadeligt og farligt.“ Tað var skaðiligt, tí fiskurin vandist við at bíta um náttina, og teir hildu, at tað var orsøkin til, at so lítið fekst um dagin. Tí fingu allir minni fisk, tí tað lá sjálvandi oftari fyri at fara út um dagin enn um náttina.

Hetta var eisini ein sosialur trupulleiki, tí „mange sygelige og tildeels gamle Mænd, som ellers føle nok ved at roe ud om Dagen, heller side hjemme og

470 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra V, nr. 974. Bræv frá Fattigcommissionen for Sydtrømø Præstegjeld, dagfest 21. mars 1855.

have intet, end vove dem ud mod den barske Nat.“ Vandamikið var tað, tí um menn rendu seg í illveður á havinum um náttina, sóu teir einki, og hvørki ýti ella kumpass kundu brúkast. Tá var skjótt at villast og enda í støðum, har tað var vandamikið at sigla. Harumframt kundi tað henda, at teir ikki sóu alduna, og tí heldur ikki kundu stýra eftir henni.

Teirra niðurstøða var, at

> Nattefiskeriet er saaledes, efter vor Mening, en uoverlagt Nyhed, som fortjener at kaldes en Uskik, der i det væsentlige og i Længden vil blive til betydeligt Tab for Fiskeriet og tillige høistfarligt for de Menneskers Liv, som drive det, fremfor naar Dagen alene anvendtes til dette Arbeide, navnlig saaledes, at Ingen kastede ned til Fisken uden om lys Dag.

Fuglfirðingarnir vildu kortini ikki hava náttarfiskarí bannað á hásumri, tá ið næturnar vóru ljósar, so teir skutu upp at banna náttarfisking áðrenn gomlu halvarðsøku, sum var 25. mai.

Hesa áheitan til myndugleikarnar sendu teir runt í norðara enda á landinum til undirskrivingar. Í Oyndarfirði, Syðrugøtu, Fuglafirði, Elduvík, Gjógv og Funningi í Eysturoynni og í Haldórsvík og Tjørnuvík í Streymoynni fingu teir nógvar undirskriftir, og alla staðni í Norðoyggjum skrivaðu fólk undir. Í Norðoyggjum høvdu nakrir einstaklingar eisini sínar egnu viðmerkingar til skrivið. Joen Joensen á Norðoyri segði, at „hvis denne Uskik ikke afskaffes men vedbliver at være almindelig, vil jeg ogsaa have mig min Frihed forbeholdt.“ Í Gerðum segði Joen Daniel Jacobsen, at „denne Uskik er nødvendig at afskaffes, for den fare som den fører med sig, og des foruden forvolder den stor forargelse blandt de Personer som vilde fiske eller drive Fiskeri paa den sædvanlige Maade.“[471] Ongin ivi var um, at talan var um eitt stríð millum tað modernaða og tað siðbundna, og at teir, sum høvdu fyrimunin í bóndasamfelagnum, vildu varðveita sína støðu. Stríðið stóð millum „gammel Skik“ og nýggjan „Uskik“.

Sýslumaðurin savnaði undirskriftirnar saman frá trimum skrivum, sum høvdu verið í umferð. Tvey av teimum vóru nærum „gaaet i Lappen“. Sjálvur legði hann afturat, at hann var samdur við teimum í, at hesin fiskiskapurin var skaðiligur, og tí vildi eisini hann hava myndugleikarnar at seta bann fyri honum, ikki bara á Norðhavinum, men allastaðni[472].

Einki sæst til, at amtmaðurin gjørdi nakað við hetta málið, so hann hevur helst verið púra greiður yvir, at henda broytingin í fiskiskapinum var íkomin av øllum teimum tiltøkunum, sum hann hevði staðið fyri sum amtmaður, og tí fór hann sjálvsagt ikki at gera nakað fyri at steðga tí. Teir, sum mótmæltu, tykjast eisini hava vitað, at amtmaðurin einki fór at gera við henda spurning, so leingi

---

471 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S. Nr. 135. Bræv frá Sivert Pedersen og Peder Pedersen dagfest í Fuglafirði 10. juli 1847 við hópin av undirskriftum frá fólki í bygdum norðanfyri.

472 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra S. Nr. 135. Bræv frá S.J. Weihe sýslumanni í Eysturoynni dagfest 9. oktober 1847.



*Sivert Pedersen og Peder Pedersen í Fuglafirði tóku í 1847 stig til at savna undirskriftir at mótmæla nýggja línufiskiskapinum.*

sum hann var einaráðandi, men tann støðan broyttist í 1852, tá ið Løgtingið varð endurstovnað. Tá fingu føroyingar ein fólkavaldan stovn, sum kundi taka mál upp og leggja uppskot fyri danskar myndugleikar.

### 17.2.2 Málið lagt fyri Løgtingið

Teir báðir fuglfirðingarnir sóu beinanvegin Løgtingið sum ein møguleika at gera vart við síni sjónarmið av nýggjum, og 6. juli 1852 skrivaðu teir eina áheitan við yvirskriftini „Færøiske Lagthingsmænd!“, sum teir fingu 81 menn úr Oyndarfirði, Elduvík, Funningi, Trøllanesi og Mikladali at skriva undir. Í brævinum byrja teir við at siga, at tinglimir høvdu fingið eitt kall at fremja føroyingsins kor, at tryggja rættin hjá hvørjum einstøkum og at fremja gagnlig átøk fyri fólkið og samstundis eisini at forða fyri óskili og „bidrage til at afskaffe Uskikke“. Tí vildu teir hava Løgtingið upp á onkran máta at avskaffa náttarfiskingina á Norðhavinum, serliga um várið, og síðani komu teir við somu grundgevingum sum í 1847[473]. Spildur nýggja Løgtingið hevði fingið eina áheitan um at steðga nýggju tíðini, longu áðrenn tað var komið saman á fyrsta sinni.

Løgtingið fekk tó eisini eina áheitan, sum vildi menna nýggju fiskivinnumøguleikarnar. Hon var frá yngra Sjóvarbóndanum Jens Hendrik Djurhuus í Kollafirði. Hann vildi hava, at móttøkan av ráfiski hjá Einahandlinum varð longd til at fevna um alt árið ella í hvussu er frá hálvum januar til hálvan oktober, tí at tá

473 TSS. Løgtingið. Skjøl 1852-56. Forskellige Lagtingssager (1852) nr. 1-10. Bræv til Løgtingið dagfest 6. juli 1852.

var møguligt at avreiða bæði torrafiskin og heystfiskin. Hann ásannaði, at tað var ein stórur fyrimunur hjá føroyingum at sleppa av við ráfiskin á henda hátt[474].

Amtmaðurin legði áheitanina hjá Sjóvarbóndanum fram 11. august[475], og 13. august søgdu nakrir tingmenn, at teir vóru ímóti hesum uppskotinum, og tá ið amtmaðurin hevði greitt frá, hvussu hetta við móttøkuni hekk saman, samtykti Løgtingið ikki at gera meira við málið[476]. Sama dag varð málið um náttarfiskingina lagt fram, men Løgtingið samtykti á næsta fundi, 16. august, við 14 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at tað ikki skuldi taka málið upp til viðgerðar[477].

## *17.3 Løgtingið ætlar at banna nýggju fiskivinnuni*

Vøksturin í nýggju fiskivinnuni setti siðvanda samfelagið undir alsamt størri trýst, og hetta trýst elvdi til, at Løgtingið gjørdi nógv meira við spurningin, tá ið tað aftur fekk fleiri áheitanir um at steðga nýggju vinnuni í 1854. Í áheitanunum varð ynski sett fram um, at bann varð sett fyri at nýta krækling sum agn, at bann varð sett fyri at nýta murtanót, og at bann ella stórar avmarkingar vóru settar fyri at fiska við línu. Serliga áhugavert er tað, at hetta fellur saman við, at privatir av álvara fóru undir at framleiða klippfisk í 1853, sum greitt er frá í kapitli 16.2, og at fiskiskapurin tí øktist við nýggju møguleikunum at avreiða.

Løgtingsformaðurin legði 31. juli 1854 fram áheitan frá nøkrum kunoyingum um línufiskiskapin[478], og dagin eftir legði hann fram áheitan frá „adskillige“ um bann móti kræklingsagni og murtanót[479]. Løgtingið valdi 2. august eina nevnd, sum skuldi viðgera hesar spurningar. Í hana komu lærarin Johannes Petersen, skraddarin Wenningsted og avtektsmaðurin Jens Hendrik Djurhuus[480].

474 TSS. Løgtingið. Skjøl 1852-56. Forskellige Lagtingssager (1852) nr. 1-10. Bræv til Løgtingið dagfest 10. august 1852.

475 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 11.

476 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 12.

477 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 13.

478 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 86.

479 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 88.

480 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 92.

*Jens Wenningsted, skraddari, var ein av limunum í nevndini, sum í 1854 varð sett at viðgera spurningin um at seta bann fyri at brúka kræklingsagn og murtanót.*



**17.3.1 Nevndarálit mælir til bann**

Nevndin var liðug at skriva álit sítt 18. august 1854, og hon býtti seg í ein meiriluta og ein minniluta. Í meirilutanum vóru teir báðir Johannes Petersen og Wenningsted, sum vildu banna teimum nýggju átøkunum í fiskiskapinum, meðan Jens Hendrik Djurhuus var einsamallur um at vera ímóti at forða nýggju menningini.

Meirilutin segði, at kræklingur fyrr í tíðini hevði verið matur hjá fólki, sum hevði havt týdning serliga í ávísum støðum í miðjuni á landinum, og dømi vóru um, at kræklingurin hevði forðað fyri hungursneyð. Tí helt meirilutin, at nýtslan av kræklingi til agn var til stóran skaða fyri fólksins lívsgrundarlag, tí tá ið kræklingurin var rivin upp í slíkum mongdum, so fór hann at hvørva ella minka so nógv, at hann ikki kom fólkinum til gagns, tá ið ringar tíðir aftur fóru at koma. Harafturat høvdu royndirnar víst, at tað ikki bar til at fiska nakað av týdningi við øðrum agni, har kræklingur hevði verið nýttur í nakrar dagar, og at enda var trupulleikin, at tað bara vóru nøkur fá, sum kundu fáa sær krækling til agn, um tey ikki gjørdu langar ferðir, sum fóru við bestu fiskidøgunum. Tað var tí púra greitt fyri meirilutanum, at kræklingsagn var til „næsten ubodelig Skade for den vigtige Næringsvei Fiskeriet.“ Meirilutin hevði eisini frætt, at tað longu var komið klandur ímillum teir, sum høvdu krækling, og teir sum komu uttaneftir at fáa sær. Tí vildu teir hava, at bann varð sett móti at nýta krækling sum agn.

Jens Hendrik Djurhuus var ikki samdar við hinar báðar í nevndini. Hann var greiður um, at kræklingur varð nýttur sum føði, men hann helt, at eitt bann ímóti at nýta hann til agn var at gera seg inn á rættin hjá honum, sum átti lutin, tí um



*Meðan Løgtingið viðgjørdi spurningin um at banna línufiskiskapi, helt virksemið hjá Jacobæusi í Álakeri fram. (Mynd: Tjóðsavnið 5101FO03)*

hann ikki fekk loyvi at brúka hann, var tað lítið vert at eiga hann. Fyri hann var málið einfalt. „Naar jeg tager Krækling som føde fra min egen Mund for at erholde en mulig større Indtægt, jeg da maa være berettiget at bruge den som Agn.“ Hann helt, at hóttanin móti kræklingastovninum var líka stór, um talan var um at eta hann ella at brúka hann sum agn. At tvístøða kundi koma ímillum teir, sum áttu rættin til kræklingin, og teir, sum vildu fiska við honum, var natúrligt, men so mátti tað vera upp til tann, sum hevði rættin til kræklingin, at taka sær av tí. Tí vildi hann mæla Løgtinginum frá at banna kræklingsagni, „ligesaalidet som andre Agn fra Stranden og adskillige fortrinlige Fiskeagn, som afbenyttes maa.“

Viðvíkjandi murtanótini helt meirilutin, at hon var til stóran skaða fyri seiðastovnin, sum hevði so stóran týdning fyri fólkið. Teir hildu tað tí vera sjálvsagt, at ansað varð so væl eftir ynglinum ella murtinum, sum til bar, og tí skuldi hann ikki drepast ella „bortskræmmes“. Murtanótin drap eftir teirra tykki nógv og jagstraði uppaftur meira yngul burtur frá landi og út á dýpið, og so vóru eingir seiðastimar eftir til fólk at nýta inni við land. Tað var tí umráðandi, at murturin fekk frið, so hann á sumri kundi verða nýttur sum summarseiður. Nógvur smáseiður inni við land gjørdi eisini, at upsi leitaði inn móti landi. Teir hildu, at royndirnar høvdu víst, at murturin var flýddur til havs, so skjótt sum menn fóru undir at seta murtanót, og tí vildu teir hava, at slíkar nótir vórðu bannaðar.

Jens Hendrik Djurhuus var samdur í, at seiður hevði stóran týdning fyri landið, og at tað var ein dýrabarur ágóði, at øll kundu fáa sær nóg mikið av seiði, men hann var als ikki samdur í útleggingini hjá hinum báðum kortini. Tá ið

menn nýttu yngulin, áðrenn hann hevði fingið eina stødd, sum kundi brúkast til matna, so var tað bara tí, at teir skuldu brúka murtin til agn. Hann trúði lítið uppá, at tað bar til at siga, at veiða eftir yngli á einum staði hevði við sær, at seiðurin hvarv har, tí fiskurin ferðaðist úr einum staði í annað uttan at spyrja um loyvi. Skuldi fiskur veiðast, ráddi um at veiða hann, meðan hann var at fáa, tí hann lá ikki og bíðaði. Hann helt ikki, at murtafiskingin gjørdi seiðinum nakran skaða, heldur tvørturímóti, tí teir 100 murtarnir, sum skuldu setast á línuna um dagin, fiskaðu kanska 50 toskar, og royndir av toskamagum vístu, at hesir toskar ótu kanska millum 10 og 20 murtar um dagin hvør. Tað merkti, at teir 100 murtarnir forðaðu fyri, at 500 vórðu etnir, og so vóru í veruleikanum 400 murtar meira í stovninum, enn um eingin fisking hevði verið. Hetta átti Løgtingið at hava í huga undir viðgerðini.

Viðvíkjandi „Afskaffelse eller Indskrænkning" av línuni søgdu teir báðir í meirilutanum, at lína var skaðilig fyri snørisfiskiskapin, „som enhver Mand kan benytte sig af og er saaledes, ligesom det fra gammel Tid har været, til en mere omfattende Nytte for Beboerne i Almindelighed." Ein trupulleiki var, at línan tók nógv pláss, og viðhvørt kundi ein lína standa frá einum miði yvir á tað næsta, og tá ið fleiri línur stóðu í sama øki, tóku tær so nógv pláss, at snøri ikki kundi nýtast har, ta tíðina línan stóð. Snørisfiskiskapur var á miðum og rekandi eftir grynnum, men nú var torført at sleppa undan at koma fastur í línur, og tá tóku javnan ósemjur seg upp, og onkur av hesum ósemjum var longu endað sum rættarmál. Tað var tí greitt, at tað ikki bar til at sameina línufiskiskap og snørisfiskiskap, og teir vóru tí „i fuld Overbevisning om, at Snørefiskeriet bør paa Grund af dets Almennyttighed foretrækkes", og tí mæltu teir til, at tingið avmarkaði línufiskiskapin, so at línan bara kundi nýtast inni á firðum, har eingin streymur var.

Jens Hendrik Djurhuus var púra ósamdur í at seta avmarkingar fyri línufiskiskapi. Hann helt, at ein slík avgerð fór at gera, at „man bliver altsaa staaende paa samme Punkt som vore Forfædre have staaet uden at kunne benytte de hjælpekilder, som den senere Tid har anviist os at være hensigtsmæssige." Hann trúði lítið uppá, at snørisfiskiskapurin var meira umfatandi enn línufiskiskapurin, og í støðum var hann vísur í, at snørisfiskiskapurin hevði verið mestsum eingin í mun til tað, sum línan nú fiskaði. Um so var, at tað var so kostnaðarmikið at fáa sær eina línu, at tað ikki var hvørs mans føri, hevði hann tikið undir við tilmælinum hjá hinum báðum, men tá ið tað ikki var støðan, dugdi hann ikki at síggja, hví „man ikke skal benytte sig af en lovlig Fordeel." Hann helt ikki, at tað var dýrari hjá fleiri at vera saman um at keypa eina línu, enn tað var hjá hvørjum einstøkum á einum báti at fáa fatur á einum snøri á 10 favnar. Hann skilti einki av, at tað skuldi kunna bannast at seta línu á eitt mið, tí tað var ikki ogn hjá nøkrum einstøkum. Øll, sum kendu miðið, kundu brúka tað. Hann helt tað vera nógv skilabetri, at føroyingar fiskaðu fiskin á miðunum, enn at útlendsk skip fóru við honum framman fyri nøsini á føroyingum. Djurhuus helt, at „Det

efter min Anskuelse staaer og maa staae Enhver frit for at bruge Langline, naar han troer at kunne udvinde mere med den end med Snøre." Tí mælti hann til, at løgtingið undir ongum umstøðum avmarkaði línufiskiskapin[481].

Nevndarálitið vísir greitt, at stórur munur var á sjónarmiðunum hjá teimum, sum sóu stórar trupulleikar í menningini av fiskivinnuni, og teimum, sum tóku undir við hesari menningini, og tað setur eisini orð á hesi sjónarmið. Nú var spurningurin bara, hvussu undirtøkan var fyri hesum báðum sjónarmiðum í Løgtinginum, og tað fór at koma fram, tá ið málið kom til viðgerðar.

### 17.3.2 Uppskotið samtykt

Nógv bendir á, at fólk fylgdu væl við gongdini í løgtingsviðgerðini, tí meðan nevndin arbeiddi, vóru tríggjar nýggjar áheitanir komnar inn um krækling og murtanót, sum tingformaðurin legði fram 19. august 1854[482], og meðan Løgtingið viðgjørdi málið, kom enn eitt skriv um tað sama[483]. Álitið hjá nevndini varð lagt fram 21. august, og fyrsta viðgerð av tí var tveir dagar seinni[484]. Tíverri er eingin frágreiðing til um, hvat sagt var undir hesi viðgerðini, tí Løgtingið skrivaði ikki orðaskiftið niður. Onnur viðgerð var 25. august. Løgtingið samtykti við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti at banna kræklingaagni, við 12 atkvøðum fyri og fýra ímóti at banna murtanót, og við 11 atkvøðum fyri og fýra ímóti samtykti tingið at taka undir við teimum avmarkingunum í línuveiðuni, sum meirilutin hevði mælt til[485].

Júst hvat er hent ella sagt komandi dagarnar er ógreitt, men stutt eftir, at Løgtingið hevði tikið undir við tilmælunum hjá meirilutanum í nevndini, skeyt Johannes Petersen upp at seta eina nýggja nevnd, sum skuldi orða eitt lógaruppskot um hesi samtyktu bannini. Løgtingið samtykti at velja fimm umboð í nevndina, og tey gjørdust Johannes Petersen sjálvur, Andrias Djurhuus prestur, H.J.J. Sørensen prestur, Andrias Djurhuus bóndi á Selatrað og Wenningsted skraddari í Havn[486].

Sjálvt um nevndin upprunaliga eisini skuldi gera lógaráseting um at avmarka línufiskiskap, soleiðis at bann varð sett fyri at fiska við línum á miðum og fiskigrunnum, og loyvi bara var til at fiska við línu á firðum, har eingin streymur var, so vildi nevndin ikki gera meira við henda partin í fyrstu syftu, tí hon vildi fyrst hava nærri upplýsingar um línufiskiskap í øðrum londum, serliga Íslandi.

---

481 TSS. Løgtingið. Skjøl 1852-56. Løgtingsálit dagfest 18. august 1854 og undirskrivað av J. Pedersen, J. Wenningsted og J.H. Djurhuus.

482 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 98.

483 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 107.

484 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 107.

485 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 108.

486 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 115.

*Johannes Petersen, lærari í Saltnesi, var íðin í arbeiðinum at banna nýggju fiskivinnuni. Hann skeyt m.a. í 1854 upp at seta eina nevnd at orða eitt lógaruppskot um at banna kræklingsagni og murtanót, og hann varð sjálvur valdur í nevndina. (Mynd: Tjóðsavnið 8966F02)*



Hinvegin dugdi nevndin ikki at síggja nakað galið í, at hon gjørdi eitt uppskot um at banna murtanót og kræklingi sum agn[487]. Tí var línufiskiskapur ikki nevndur beinleiðis í uppskotinum, men at banna agninum, sum varð nýtt á línuni, var nærum tað sama sum at banna línufiskiskapi.

Lógaruppskotið var til viðgerðar 11. september, og 11 atkvøddu fyri at koyra tað til aðru viðgerð, meðan fimm vóru ímóti at gera meira við uppskotið. Til aðru viðgerð var fyrsta greinin í lógini sett til atkvøðugreiðslu við navnaupprópi, og tað gevur okkum høvi til at síggja, hvør var í hvørjum partinum. 12 tinglimir atkvøddu fyri § 1, sum bannaði nýtsluni av murtanót. Teir vóru Hans David Matras, Poul Edward Lange, Andreas Djurhuus, Andreas Christian Lützen, Jens Wenningsted, Johan Olsen, Niels Winther, Johannes Pedersen, Andreas Djurhuus, Guttorm Absalonsen, Hans Jørgen Jacob Sørensen og Jacob Jacobsen. Teir, sum søgdu nei og harvið kunnu roknast millum stuðlarnar hjá nýggju fiskivinnuni, vóru amtmaðurin, Jens Hendrik Djurhuus, Jacob Zachariassen, sýslumaður, Daniel Jacob Mortensen og Hans Djurhuus. Pastor Prytz atkvøddi ikki[488].

Av teimum, sum atkvøddu fyri bannunum, vóru 3 prestar og 5 bøndur, og tað er ikki so løgið, at tað vóru júst hesir bólkar, sum royndu at verja verandi skipan. Hinvegin undrar tað eitt sindur, at báðir lærararnir, einasti handverkarin

---

487 TSS. Løgtingið. Skjøl 1852-56, 1854. Forskell. Lagtingssager nr. 1-12, 19-20, 22, 27, 30-32, 29. Nevndarálit dagfest 7. september 1954.

488 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 140.

í tinginum og løgfrøðingurin Niels Winther tóku undir við avmarkingunum. Umframt Sjóvarbóndan vóru tað báðir tinglimirnir í Suðuroynni, sum ikki vildu taka undir við at seta forðingar fyri línuveiðuni. Teir báðir vóru eisini bøndur, men tað kundi verið líkt til, at umstøðurnar í Suðuroynni hava verið eitt sindur øðrvísi hesum spurninginum viðvíkjandi, og at teir tí hava grundað sína støðutakan á, hvat tænti teirra valdømi best.

§ 2, sum ásetti bann ímóti at nýta krækling sum agn, varð samtykt við 13 atkvøðum fyri og tveimum ímóti, meðan tríggir ikki atkvøddu. Teir báðir, sum atkvøddu ímóti vóru amtmaðurin og Jens Hendrik Djurhuus, meðan hinir tríggir, sum høvdu atkvøtt nei til § 1, ikki atkvøddu. Prytz prestur atkvøddi fyri hesari lógargreinini. Hinar báðar lógargreinirnar, sum viðvíktu revsing av broti á lógina, vóru samtyktar við 12 atkvøðum fyri og fimm ímóti, og samlaða uppskotið varð eisini samtykt við sama atkvøðubýti[489].

Nakrar dagar seinni høvdu Johannes Petersen og H.D. Matras orðað eitt uppskot um skriv, sum Løgtingið skuldi senda saman við lógaruppskotinum til Innanríkisráðið[490]. Tá nýttu tríggir tinglimir, Jens Hendrik Djurhuus, D.J. Mortensen og Hans Djurhuus høvið at leggja afturat minnulutaálitinum, at tað var sera lítil møguleiki fyri og als eingin vissa fyri, at kræklingsagn var skaðiligt, og t.d. fiskaðu hetlendingar við stórum kræklingi ella øðu, uttan at tað hevði nakra skaðiliga ávirkan á fiskiskapin hjá øðrum. Teir hildu eisini, at tað var ógrundað at halda, at murturin gjørdist villur av nótini, tí hvørki murtur ella seiður varð standandi í sama stað bæði vetur og summar. Tí vildu teir hava, at Løgtingið eisini bíðaði við hesum málunum, eftirsum Løgtingið longu hevði avgjørt at bíða við at taka avgerð viðvíkjandi línufiskiskapinum, tí talan var um agn til línu. Zacharriassen sýslumaður nýtti eisini høvi til at leggja afturat, at hann tók undir við hesum tilmælinum um murtanót og línu, tá ið miðini á havinum vóru undantikin[491].

### 17.3.3 Amtmaðurin mælir Innanríkisráðnum frá at seta lógina í verk

Í hesum líki fekk amtmaðurin uppgávuna at senda málið víðari til myndugleikarnar í Keypmannahavn. Amtmaðurin sendi málið víðari 2. oktober saman við øllum teimum nevndu skjølunum og áheitanunum. Í frágreiðingini hjá amtmanninum sæst, at tað vóru fólk á Selatrað, í Funningi og í Norðoyggjum, sum høvdu sent áheitanir, meðan tingið viðgjørdi málið, og at síðsta áheitanin var frá kollfirðingum, sum ikki vildu hava nakað bann innført ímóti at brúka krækling og murtanót. Sostatt stóð yngri Sjóvarbóndin ikki einsamallur við sínum sjónarmiðum í heimbygd síni.

489 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 141.

490 TSS. Løgtingið. Skjøl 1852-56. Løgtingsálit dagfest 15. september 1854 og undirskrivað av J. Pedersen og H.D. Matras.

491 TSS. Løgtingið. Skjøl 1852-56. Løgtingsálit dagfest 15. september 1854 og undirskrivað av J.H. Djurhuus, D.J. Mortensen og H. Djurhuus við eyka viðmerking frá Zachariassen.

Amtmaðurin segði, at nógvur kræklingur var at fáa serliga í Streymoynni, og tað var frálíkt agn. Hann hevði tosað við fleiri útróðrarmenn, og út frá tí ivaðist hann stórliga í, um nakað var um vansan, sum meirlutin í nevndini hevði víst á, at fiskur ikki beit annað agn, tá ið kræklingur hevði verið nýttur. Í mesta lagi kundi talan vera um, at báturin við kræklingi sum agn fekk meira fisk, enn ein bátur, sum lá tætt við, sum fiskaði við øðrum agni. Talan var tí bara um, at kræklingur var betri agn og ikki, at fiskurin vandist við agnið. Frá øðrum hevði hann fingið at vita, at tað meir enn so kom fyri, at tað var umvent, soleiðis at tann, sum fiskaði við kræklingi, einki fekk, meðan hinir drógu gylt. Óttin fyri kræklinginum var tí ógrundaður. Tá ið bátar fiskaðu ymiskt, sjálvt um teir lógu upp at hvørjum øðrum, komst tað helst av, at annar báturin var komin at liggja á einum stað, har toskurin stóð júst tá. Og hann var eisini greiður um, at tað var vøksturin í nýggju fiskivinnuni, sum var orsøk til klagurnar, tí

> Der er i aar her om Kysterne fanget en meget betydelig Mængde Torsk. De Mænd, der sædvanlig bruge Krækling til Agn og Langline, ere driftige Folk, de have fisket betydeligt iaar, og faaet en god Fortjeneste; det er, saavidt jeg veed, først iaar, at Klagen um brugen af Kraklingeagn er fremkommen. Det turde maaske ikke være usandsynligt, at Grunden til Ønsket om et Forbud mod Brugen af Kraklingsagn for en liden Deel maa søges i Misundelse.

Í Løgtinginum hevði dentur verið lagdur á eina søgn um, at nýtsla av kræklingi til agn hevði verið bannað í forntíðini við lóg, og at tað var bannað í Hetlandi. Amtmaðurin ivaðist stórliga í, um nøkur slík søgn var til, og hann ivaðist eisini stórliga í, um nakað bann var í Hetlandi, men hann visti tað ikki. Hann visti bara, at Pløyen í frásøgn síni hevði sagt, at har brúktu teir kræling sum agn. Hann ivaðist tí stórliga í, um nøkur orsøk var at banna krækingsagni, um ein slík avmarking í vinnurættinum var rímilig, og um tað var almannagagnligt.

Viðvíkjandi murtinum var amtmaðurin púra samdur við Jens Hendrik Djurhuus, og hann visti at siga, at tað serliga vóru menn, sum settu línu, sum nýttu murtin til agn, og hetta hevði víst seg at vera ein frálíkur møguleiki, sum ikki mátti gleppa føroyingum av hondum. Amtmaðurin segði:

> Paa flere Steder her paa Landet har man i den senere Tid begyndt at fiske med Langliner. Denne Maade at fiske paa, der især er fordelagtig for Beboerne af de Bygder, der have lang Vei at roe for at komme paa Fiskeri, har vist sig fordelagtig, ja stundom endog til en forbavsende Grad. Til Agn paa Langliner benytter man Murt; ethvert andet Agn ansees for ufordeelagtigt. Et Forbud mod at fange Murt med Nout bliver derfor af dem, der besidde Langliner, betragtet som ensbetydende med et Forbud mod brugen af Langliner.
>
> Da det er fuldkommen afgjort, at Fiskeri med Langline er meget fordelagtigt, og at det bedste Agn, man kan bruge paa Langliner, er Murt, troer jeg, at det maa ansees høist utilraadeligt, at forbyde at fange Murt med Garn, forinden det er blevet bevist at Murtefangsten er til skade for Seiefiskeriet, og forinden



*Tá ið amtmaðurin skuldi senda lógaruppskotið hjá Løgtinginum víðari til Innanríkisráðið, ásannaði hann, at ein slík lóg fór at steðga góðu menningini, sum línufiskiskapurin hevði sett ferð á. Hann kundi tí ikki taka undir við, at avmarkingar vórðu settar fyri at troyta natúrligar og lógligar vinnumøguleikar. (Mynd: Tjóðsavnið 8662F01574)*

> det ialtfald er godtgjort, om ikke den forøgede Torskefangst med Langline langt opveier hvad der maaske tabes i henseende til Seiefiskeriet.

Tí vildi hann hava eina nógv gjølligari kanning gjørda, áðrenn man „begrændser de herværende Beboeres naturlige og lovlige Erhvervskilder.“[492]

### 17.3.4 Kongur stuðlar amtmanninum

Amtmaðurin var ikki einsamallur við sínum sjónarmiðum, tí umframt teir fimm tinglimirnar, sum vóru ímóti bannunum, var eisini ein mótstøða millum fólk ímóti tí, og tað sást millum annað, tá ið ein áheitan kom frá streymoyingum og eysturoyingum um ikki at seta lógina í verk[493].

Innanríkisráðið legði málið fyri kong, og 22. februar 1855 hevði kongur givið ráðnum myndugleika til at boða Løgtinginum frá, at tað onga orsøk sá til at fremja tað lógaruppskotið, sum Løgtingið hevði sent til tað[494]. Sostatt eydnaðist tað amtmanninum at steðga samtyktini hjá Løgtinginum, og fiskivinnan fekk frið

492 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 123. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 2. oktober 1854.

493 TSS. Færø Amt. Kopibók GG, bræv nr. 127. Bræv til Innanríkisráðið dagfest 21. oktober 1854.

494 TSS. Løgtingið. Skjøl 1852-56, 1854. Forskell. Lagtingssager nr. 1-12, 19-20, 22, 27, 30-32, 29. Avskrift av brævi frá Innanríkisráðnum dagfest 11. mai 1955.

at mennast eina tíð afturat. Løgtingið hevði bara ráðgevandi myndugleika, og tí var einki formligt í vegin fyri, at danska stjórnin ikki tók viljan hjá tinginum til eftirtektar, men tað man hava kenst eitt sindur snópisligt hjá meirilutanum, at hansara lógaruppskot so lættliga varð skúgvað av vegnum. Samstundis sum tað er løgið, at fólkaræði á henda hátt varð sett til síðis, so er tað eisini margháttligt, at tað var gamla embætisverkið hjá kongi, sum tryggjaði, at ongar forðingar vóru settar fyri framburðinum, meðan fólkaræðisligi meirilutin heldur vildi hyggja aftureftir enn frameftir.

## *17.4 Mótstøðan móti línuni harðnar*

Tá ið Løgtingið kom saman aftur á ólavsøku 1855 legði amtmaðurin svarið frá Innanríkisráðnum fyri tingið[495]. Samstundis vóru eisini nýggjar áheitanir á Løgtingið komnar frá fólki um at steðga línuveiðuni. Ein nevnd varð á ólavsøku 1855 sett at taka avgerðir í fleiri ymiskum málum, og í hana fór málið um at steðga línufiskiskapi.

Tingmaðurin Hans David Matras hevði skrivað fyrstu áheitanina 16. juni, og hann hevði fingið yvir 100 menn í Norðoyggjum at skriva undir. Hetta bræv hansara var um at banna fiskiskapi um náttina. Dagin eftir hevði hann skrivað eina aðra áheitan um at avmarka línufiskiskapin, sum somu menn eisini skrivaðu undir. Eitt líknandi skriv var komið frá P. Larsen og øðrum þorkeningum dagfest 24. juli, og henda sama dag høvdu Hans Heinesen og aðrir eisini orðað eitt líknandi skriv, sum Niels Winther bar Løgtinginum.

### 17.4.1 Løgtingið útsetur málið

Nevndin helt ikki, at Løgtingið skuldi „udvirke denne Indskrænkning i Fiskeriet paa aabent Hav", men hon ásannaði, at hetta var eitt týdningarmikið mál, men tað kravdi so gjølliga umhugsan, at tingið ikki fekk tíð til at gera tað í árinum. M.a. skuldu fleiri frágreiðingar fáast til vega. Harumframt kom, at amtið var farið at viðgera málið, og tí mælti nevndin til, at tingið bíðaði við at viðgera tað[496].

Niels Winther legði 9. august uppskot fram um eina áheitan frá Løgtinginum til Innanríkisráðið í sambandi við, at kongur hevði avgjørt ikki at fremja málini um kræklingsagn og murtanót. Winther segði, at við fyrsta eygnakast kundi tað virka sum ein „unaturlig Indskrænkning i Næringsfriheden", og síðani komu somu grundgevingar sum árið fyri. Winther legði kortini eisini afturat, at kræklingur bara fekst í nøkrum fáum støðum, har kyrt var, og tað gjørdi, at hetta gjørdist til eitt monopol fyri nakrar einstaklingar. Í hesum tíðum, tá so nógv varð gjørt við at avtaka monopol, kundi tað als ikki góðtakast, at hetta

495 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 150.

496 TSS. Løgtingið. Ymisk mál 1852-56. Álit frá Ymiskmálanevnd dagfest 4. august 1855.

monopolið slapp at halda fram. Tí vildi hann hava Innanríkisráðið at leggja málið fyri Ríkisdagin, so at Ríkisdagurin kundi taka støðu til avgerðirnar hjá Løgtinginum og Innanríkisráðnum.

Nevnd við Krog, Lützen og Sørensen sum limum varð sett at viðgera uppskotið hjá Winther, og hon ráddi frá at taka uppskotið til viðgerðar í árinum, og tað varð samtykt við 11 atkvøðum fyri[497]. Tí kom eitt broytingaruppskot frá tingmonnunum Winther, Joen Jacobsen, Andreas Djurhuus, H.D. Matras, N.J. Joensen, D.P. Christiansen, J. Wenningsted, Hans Olsen, Joen Danielsen, Heine Heinesen og S.J. Weihe um at leggja uppskotið fram kortini, men bæði tað og upprunauppskotið vóru tikin aftur 24. august[498]. Sostatt tók Løgtingið onga støðu til hesi málini í 1855, og áðrenn tað kom saman aftur, var Einahandilin farin í søguna.

### 17.4.2 Amtmaðurin kannar línufiskiskap

Nógvu áheitanirnar um at banna línufiskiskapi gjørdu, at amtmaðurin á vári 1856 valdi at skriva til Innanríkisráðið um málið. Hann greiddi frá tí, sum hevði gingið fyri seg í Løgtinginum árið fyri og um allar áheitanirnar, sum tingið hevði fingið. Tað var, tá ið hann greiddi tinginum frá, at hann sjálvur ætlaði at leggja málið fyri Innanríkisráðið, at tingið avgjørdi ikki at taka málið upp. Amtmaðurin hevði, longu tá ið fyrsta áheitanin kom, avgjørt at biðja sýslumenninar greiða sær frá, hvussu umfatandi línufiskiskapurin var, og hvussu hetta ávirkaði samlaða fiskiskapin. Hesar frágreiðingar legði hann við málinum til ráðið, og hann legði eisini tvær áheitanir úr Suðuroynni um ikki at banna línuni við.

Síðani vísti hann til Íslands og Noregs, har fiskað var eftir toski við gørnum, línu ella snøri, og allar royndir vístu, at tað kom nógv meir burtur úr at fiska við línu enn við snøri, og tað var eisini minni arbeiðskrevjandi. Tí visti hann einki um, at man nakrastaðni tosaði um at banna línufiskiskapi, heldur royndi man at eggja til henda fiskiskap. Hann kendi bara til nakrar lógarásetingar í Noregi, sum høvdu til endamáls at skipa viðurskiftini, har nógv komu saman til tíðir á avmarkaðum øki. Hann visti einki um, at nakar helt, at tað var skaðiligt fyri fiskiskapin at fiska við línu og gørnum. Tí trúði hann heldur einki upp á uppáhald norðoyinga um, at línan útruddaði botnfiskin og harvið oyðilegði allan fiskiskapin. Hetta var „ganske sikkert aldeles ubeføiet."

Amtmaðurin var vísur í, eftir at hava samskift við franskar og enskar fiskimenn og lisið bøkur um evnið, at línan als ongan skaða gjørdi, men at línan hevði so nógvar fyrimunir fram um snørið. Hesa vitan fekk hann váttaða seinnapartin av árinum fyri, tá ið til bar at gera nógvar royndir í Føroyum. Hesa tíðina vóru „anskaffet en temmelig stor Mængde Langliner, og uagtet der med disse er drevet

497 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og endt den 22de August 1855, s. 181.

498 TSS. Løgtingið. Skjøl 1852-56, 1854. Forskell. Lagtingssager nr. 1-12, 19-20, 22, 27, 30-32, 29. Avskrift av uppskoti til Løgtingið dagfest 9. august 1855, og avskrift av løgtingsprotokol sama stað.



*Dahlerup amtmaður helt í 1856, at mótstøðan móti línuni bara bygdi upp á vanligu andstygdina í bóndasamfelagnum ímóti øllum nýggjum. Tað var ikki rætt at taka undir við hesum sjónarmiðnum, tí vegurin fram var at stuðla íbúgvunum í at brúka nýggja veiðiháttin. Henda støða amtmansins gjørdi, at nøgdirnar av virkaðum fiski í Álakeri kundu vaksa, sjálvt um mótstøðan móti nýggju vinnuni var stór.*
*(Mynd: Tjóðsavnið 5101F081)*

et yderst fordelagtigt Fiskeri, har man dog ved Snørefiskeriet, som er drevet samtidig dermed og ved Siden deraf, ligeledes fisket særdeles godt, saa at brugen af Langliner ikke synes paa nogensomhelst Maade at have skadet Snørefiskeriet."

Niðurstøðan hjá amtmanninum var, at mótstøðan ímóti línuni ikki var grundað í øðrum enn „i den hos enhver Almue opstaaende Uvillie mod alle nye Indretninger og Foranstaltninger". Hann helt als ikki, at línufiskiskapur skuldi avmarkast ella bannast, tí brúk var heldur fyri at „opmuntre Beboerne til Brugen af et saa nyttigt Fiskeredskab, i særdeleshed da Anskaffelse af en Langline ikke medfører større Omkostninger, end næsten enhver Familiefader vil kunne være istand til at udrede." Hann helt ikki, at stjórnin hevði orsøk til at leggja seg upp í málið, fyrr enn línan var vorðin so vanlig, at hon kundi føra til tvídrátt um, hvør hevði rætt til at fiska í ymiskum støðum. Einasta orsøkin til, at hann legði spurningin fyri ráðið, var, at so mong gingu so høgt upp í hetta málið[499].

Løgmálaráðið svaraði 19. mai 1856 skrivinum hjá amtmanninum, og svarið var heilt einfalt, at tað „ikke finder Anledning til for sit Vedkommende at foretage

499 TSS. Færø Amt. Kopibók KK, bræv nr. 50. Bræv til Innanríkismálaráðið dagfest 10. mars 1856.

Noget ved denne Sag."[500] Hetta skriv legði amtmaðurin fyri Løgtingið ólavsøkudag 1856, men tað tykist ikki, sum at Løgtingið gjørdi meira við spurningin í fyrstu syftu. Línufiskiskapurin øktist alla tíðina, og tí vóru tey alsamt fleiri og fleiri, sum fingu gagn av nýggju fiskivinnuni. Tað gjørdi helst eisini, at tær røddirnar, sum vildu banna henni, fækkaðust, og tað kann hava gjørt sítt til, at Løgtingið í 1856 ikki rættiliga visti, hvørjum beini tað skuldi standa á.

## *17.5 Línuspurningurin stingur seg upp aftur*

Tvey ár seinni tók spurningurin seg uppaftur, tá ið norðoyingar tóku seg saman um at skriva eina nýggja áheitan á Løgtingið um línufiskiskapin. Teir vístu til skrivini tvey ár frammanundan, har teir høvdu gramt seg um, at línan oyddi fiskigrunnarnar, og at hon „ligesom indhægner Havet, som ellers skulde og burde være tilgængeligt for Alle." Teir høvdu einki hoyrt aftur um, at Løgtingið hevði gjørt nakað við spurningin, og tí skrivaðu teir enn eina ferð. Hesa ferð løgdu teir dent á, at snøri og lína ikki kundu virka saman, tí annað fylgdi streyminum, meðan hitt amboðið lá fast á botni. Nú vildu teir hava lógarásetingar gjørdar um, hvussu gerast skuldi við hesar trupulleikar. Teir vildu vera við, at í flestu støðum í landinum bar ikki til at brúka línu, tí lendingarnar vóru so óhøgligar. Tí var tað syrgiligt, tá ið man hættaði sær á flot av brimplássi at síggja, at man var umringaður av línu, tá man kom á aldagomul mið og aðrar leiðir. Hetta kundi gera, at man stríddist í fleiri dagar til onga nyttu[501].

Stutt eftir skrivaðu vágamenn eisini til Løgtingið, har teir boðaðu frá, at tíðindini um stóra fongin, sum eysturoyingar og norðoyingar høvdu fingið við at seta línu, høvdu gjørt, at eisini vágamenn vóru farnir at royna nýggja reiðskapin. Fyrstu tíðina settu teir mest línu á stillum vatni inni við land, men tá ov lítið kom burtur úr tí, fóru teir at seta línuna á streymasjógvi og til havs. Tað órógvaði vanliga fiskiskapin, og skjótt var lítið og einki at fáa í støðum „i Nærheden af deres Bopæl", har nógv var at fáa fyrr. Tí óttaðust vágamenn fyri, at línufiskiskapurin fór at oyðileggja snørisfiskiskapin, og tí vildu teir hava Løgtingið at banna línufiskiskapi á streymasjógvi og úti til havs[502].

---

500 TSS. Færø Amt. Indkomne Breve litra X, bræv nr. 652. Bræv frá Løgmáláráðnum dagfest 19. mai 1856. Tað er ikki eydnast mær at finna nógvar av teimum áheitanunum, sum eru umrøddar í hesum kapitlinum. Tær eru tíverri ikki at finna undir nøkrum at teimum journalnumrunum, sum hesi brøv upprunaliga vóru goymd undir. Heldur ikki frágreiðingarnar um línufiskiskapin, sum sýslumenn sendu úr hvør sínari sýslu, eru at finna. Hesi skjølini fóru helst øll til Løgmáláráðið, tá ið tað skuldi viðgera málið, og í hesum brævinum, sum ráðið sendi aftur til Føroya, stendur, at skjølini eru viðløgd, men við hond er skrivað á, at „Bilagene fulgtes ikke". Hvar tey so eru endað, er torført at meta um.

501 TSS. Løgtingið. Løgtingsmál, 1856-1858. Avrit av brævi frá norðingum dagfest í Ánunun 19. mai 1858.

502 TSS. Løgtingið. Løgtingsmál, 1856-1858. Avrit av brævi frá vágamonnum dagfest í Miðvági 20. juli 1858.

Gjáarmenn og oyndfirðingar høvdu frætt, at norðoyingar vóru farnir at arbeiða fyri at fáa sett bann fyri línufiskiskapi bæði úti til havs og inni á firðum, og teir dugdu ikki at síggja nakra orsøk til, at Løgtingið skuldi taka undir við einum slíkum uppskoti. Teir greiddu frá, at fiskurin um várið og fyrsta partin av summarinum stóð spjaddur og ikki leitaði sær so nógv á miðini, og tá hildu teir, at línan egnaði seg best at fiska við, tí við línuni fingu teir tvífalt so góða inntøku sum við snørinum. Teir hildu lítið um at banna føroyingum at fiska við línu, meðan útlendsk skip á hvørjum ári lógu og fyltu seg upp við føroyskum fiski. Seinna partin av sumrinum, um heystið og um veturin hildu teir, at snørisfiskiskapurin egnaði seg best, tí tá samlaði fiskurin seg saman og leitaði sær á fiskimiðini[503].

Hesi brøvini vórðu løgd fram á Løgtingi ólavsøkudag 1858[504]. 27. august varð eitt nevndarálit lagt fram um línufiskiskapin[505]. Nevndin ásannaði, at línan hevði fiskað væl betri enn aldagamli snørisfiskiskapurin. Tí var eingin ivi um, at línufiskiskapurin gav besta úrslitið til tann einstaka, um tað bara var tað úrslitið, sum var avgerandi. Hinvegin helt nevndin, at tað hevði alstóran týdning at tryggja, at „det stedse kan afgive Udkomme for Landets Befolkning“, og tí vildi hon ikki hava fiskiskap, sum oyðilegði fiskiskapin hjá teimum flestu. Tað var júst tað, sum fleiri vildu vera við hendi, tá ið fiskað varð við línu. Línan fiskaði allan fiskin á miðunum og vandi fiskin við ikki at bíta á snøri. Tí fór úrslitið av línufiskiskapinum at gerast, at „Fiskeriet efter kortere eller længere Tids Forløb reent ødelagdes.“ Passaði tað, átti línan at verið bannað, men nevndin helt seg ikki vera føra fyri at meta um henda spurning.

Nevndin helt, at bæði norðmenn og íslendingar mundu hava fingið nógvar royndir við línufiskiskapi, og tí mælti hon tinginum til ikki at gera meira við málið, men heldur lata amtmanninum tað við eini áheitan um at kanna ávirkanina hjá línuni aðrastaðni, um hesin reiðskapur varð hildin at vera skaðiligur aðrastaðni, og um hvat gjørt varð fyri at avmarka línuna har. Tá ið Løgtingið fekk hesar upplýsingar, kundi tað taka málið uppaftur[506]. Hetta uppskotið hjá nevndini varð samtykt 28. august við 13 atkvøðum fyri og ongari ímóti[507].

Tá ið amtmaðurin sendi málið víðari til Løgmálaráðið, tók hann fult undir við álitinum hjá løgtingsnevndini. Hann legði afturat, at ein treyt fyri at brúka línuna var ein bústaður, har tað bar til at koma á sjógvin hvønn dag at røkja línuna. Tí var tað sjálvsagt, at tey, sum búðu á brimplássum, ella har lendingarviðurskiftini vóru vánalig, í nógv minni mun kundu fáa nakran fyrimun av línufiskiskapi.

503 TSS. Løgtingið. Løgtingsmál, 1856-1858. Avrit av brævi frá 28 gjáarmonnum og 18 oyndfirðingum dagfest við Gjógv 6. juli 1858.

504 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861. s. 73

505 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861. s. 102

506 TSS. Løgtingið. Løgtingsmál, 1856-1858. Álit frá løgtingsnevnd dagfest 27. august 1858.

507 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861. s. 104.



*Gjáarmenn og oyndfirðingar hildu ikki, at nøkur orsøk var til, at Løgtingið tók undir við at banna línufiskiskapi. Tað er eitt dømi um, at so hvørt sum línan gjørdist vanligari, vaks undirtøkan fyri nýggja veiðuháttinum.*

Amtmaðurin helt, at „dette er, saavidt jeg har kunnet erfare, den egentlige og væsentlige Grund til Striden om Langlinefiskeriet“, og tað vóru fólk á slíkum plássum, sum vildu hava sett bann fyri línufiskiskapi[508]. Var tað, sum amtmaðurin helt, so var spurningurin um línufiskiskap ikki so nógv eitt stríð ímillum nýtt og gamalt longur, men gjørdist spakuliga til ein tvídrátt ímillum tey, sum høvdu høgligar landafrøðiligar umstøður at fiska við línu, og tey, sum ikki høvdu tað.

508 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, bræv nr. 28. Bræv til Løgmálaráðið dagfest 6. september 1858.

## *17.6 Fremmandi fiskiskapurin aftur á dagsskránna*

Samstundis sum línuspurningurin var við at broytast til at verða ein tvídráttur millum ymisk støð í landinum, tók spurningurin um fremmanda fiskiskapin undir Føroyum seg uppaftur. Tá ið eysturoyingar vardu línufiskiskapin, vístu teir á, at tað var høpisleyst at avmarka fiskimøguleikar hjá føroyingum, samstundis sum fremmand skip fyltu seg við fiski. Henda trupulleika tóku eisini suðuroyingar upp, tá ið teir í 1859 sendu amtmanninum eina áheitan um, at tað skuldi forðast fremmandum at fiska innanfyri 1½ til 2 míl undir landi.

Amtmaðurin kendi væl til, hvussu stór forðing útlendski fiskiskapurin var fyri føroysku fiskivinnuna, og talan var ikki bara um bretar, tí eisini fransmenn og belgiar fiskaðu nógv undir Føroyum. Teir fiskaðu ikki bara á bestu miðunum, men tá ið fiskurin stóð undir landi, leitaðu fiskimenn sær eisini heilt inn undir land at fiska, og teir kundu eisini finna uppá at fiska har í báti. Almenna hugsanin hevði í øldir verið, at danska stjórin átti fiskiskapin við donsku hjálondini í Norðurhavi, serliga innan fyri 4 fjórðingar, og skip, sum komu inn um hetta mark, skuldu takast. Amtmaðurin visti ikki, um fremmandu stjórnirnar høvdu fingið boð um hetta, men hann væntaði ikki, at hesar reglur nakrantíð fóru at kunna haldast, um ikki eitt orlogsskip varð sent til Føroya at hava eftirlit. Undanmenn hansara sum amtmenn høvdu fleiri ferðir gjørt vart við henda trupulleika, og hann kundi bara vera samdur við teimum[509].

Fiskiskapurin var ógvuliga góður í 1859, og veðrið hevði verið sera gott til klippfiskavirking. Tí roknaði amtmaðurin við, at nógvur fiskur fór at verða útfluttur, men rúgvan av útlendskum skipum, sum fiskaðu millum ½ og 3 fjórðingar úr landi, hótti henda fyri føroyingar so týdningarmikla vinnuveg. Amtmaðurin hevði fingið at vita, at hetlendingar í tíðini frá apríl til mitt í juni høvdu fingið eina hálva millión toskar. Hetlendingar viðgingu, at um fiskastovnarnir áhaldandi vórðu so nógv troyttir, so fór endin at gerast tann sami sum undir Hetlandi, har eingin fiskur var at fáa longur innanfyri nakrar fjórðingar úr landi. Tí var átroðkandi at gera nakað við henda spurning sum skjótast, og hann skuldi við næsta skipi koma við einum uppskoti[510]. Tá ið uppskotið kom fyri í donsku stjórnarskipanini, varð hon knýtt at spurninginum um skansamanningina í Havn og gjørdist nógv knortlutari, enn amtmaðurin mundi ætlað. Úrslitið var í hvussu er, at einki orlogsskip kom til Føroya at hava eftirlit við fremmandu fiskiskipunum.

Henda royndin at fáa eitt verjuskip til Føroya at ansa eftir fremmandu fiskiskipunum er áhugaverd, tí at tað var júst tá sami spurningur kom á borðið hjá Tillisch amtmanni í 1832, at gongd av álvara kom á royndirnar at menna eina

509 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, bræv nr. 124. Bræv til Løgmálaráðið dagfest 30. apríl 1859.

510 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, bræv nr. 144. Bræv til Løgmálaráðið um landsins støðu dagfest 19. juli 1859.

føroyska fiskivinnu. Grundgevingin tá var, sum greitt er frá í kapitli 7.1, at tað var ov kostnaðarmikið at verja landgrunnin, og tí var tað rættari at menna eina føroyska fiskivinnu, sum kundi taka kappingina upp við fremmandu fiskiskipini. Nú gongd var komin á fiskivinnuna, var framvegis tørvur á einum verjuskipi, men nú var tað fyri at verja nýggju vinnuna.

Sjálvt um fremmandi fiskiskapurin kendist hóttandi, so helt fiskivinnan á at fáa størri og størri týdning í Føroyum. Í einari frágreiðing um landsins støðu segði amtmaðurin í september 1859, at fiskiskapurin hevði verið góður, og tað var gleðiligt, „eftersom det er en Erhvervskilde, der staaer enhver Færing aaben og efter som Færingerne aarlig mere og mere synes at blive henviste til ved den at erhverve det væsentligste bidrag til deres Subsistens."[511] Aftur henda veturin sást fyrimunurin við línuni, tí vánaligt veður hevði gjørt, at lítið kom burtur havfiskarínum, men nógv var fiskað á víkum og vágum við línu[512].

## *17.7 Amtmaðurin frákoyrdur, og Løgtingið vil skipa fiskiskap heldur enn banna línu*

Árið 1860 gjørdist eitt søguligt ár bæði fyri amtmansstovnin og fyri Løgtingið, tí góðar tríggjar vikur eftir, at Løgtingið var komið saman á ólavsøku, kom eldur í eina krúttunnu, sum leingi hevði staðið til at bresta. Tá ið Løgtingið skuldi setast á middegi 23. august, møttu bara sjey tinglimir saman við amtmanninum, sum var formaður. Amtmaðurin útsetti fundin til klokkan 2, men har komu bara teir somu, og tá las formaðurin eitt bræv frá hinum, har teir boðaðu frá, at teir ikki fóru at møta aftur á tingi hetta árið. Amtmaðurin sendi tí tingið heim sama dag[513].

At so nógvir tinglimir noktaðu at møta á tingi, var kulminatiónin og endin á einum áralongum stríði millum ávísar bólkar í Løgtinginum og amtmannin, sum eisini var tingformaður. Tvídrátturin byrjaði sama ár, sum Løgtingið kom saman á fyrsta sinni í 1852, og verður ofta sagdur at vera íkomin av tí ójavnvág, sum var millum tann valdsmikla amtmannin og vanligu tinglimirnar. Umframt sjálva valdsójavnvágina, var amtmaðurin løgfrøðingur og væl inni í øllum lógum og almennum mannagongdum, og tinglimirnir vóru púra óroyndir. Tað kom tí javnan fyri, at teir føldu seg niðurgjørdar av amtmanninum, tá ið hann rættaði teir ella gjørdi viðmerkingar til álit og aðrar hugsanir. Á tann hátt botnaði nógv av ósemjuni í persónligum stríði, sum Steining (Steining 1958: 215–227) og Langkilde (Langkilde 2018) hava hvør sína hugsan um.

---

511 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, bræv nr. 185. Bræv til Løgmálaráðið um landsins støðu dagfest 19. september 1859.

512 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, bræv nr. 205. Bræv til Løgmálaráðið um landsins støðu dagfest 24. mars 1860.

513 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861. s. 158.

Eftir at Løgtingið varð sent heim 23. august 1860, var upp á tal bæði at broyta tingskipanina soleiðis, at amtmaðurin ikki longur skuldi vera formaður, og onnur hildu, at tað besta var bara at avtaka tingið aftur. Hetta seinna helt amtmaðurin lítið um, tí tað var tað sama sum at styrkja ávirkanina hjá teimum, sum vóru farnir til hús. Hann vísti eisini á, at helvtin av tingmonnunum skuldu veljast av nýggjum sama ár, og tá fóru helst fleiri av teimum at falla. Løgmálaráðið kom kortini til ta niðurstøðu, at viðurskiftini neyvan fóru at batna, so leingi sum Dahlerup sat sum amtmaður. Tí varð hann í 1861 útnevndur til herredsfoged í Odense. Hetta hevur Jørgen Steining lýst sum, at „han *faldt* således ikke *opad*, som det ofte er tilfældet med højere embedsmænd, men dalede dog stille ned i et virkelig fedt embede." (Steining 1958: 227) Langkilde endurgevur hesa viðmerkingina hjá Steining, men sigur, at Dahlerup kundi valt sær tað embætið, sum hann vildi hava, og hann valdi sjálvur starvið í Odense, sum hann røkti fram til summarið 1890. Fjúrtan dagar eftir, at hann fór úr hesum starvinum, doyði hann 76 ára gamal (Langkilde 2018: 517)

Tað er ikki eydnast mær at finna nakað beinleiðis samband millum spurningin um línuna og ta støðugu ósemjuna millum amtmannin og nógvar av tingmonnunum, men tað hevði verið áhugavert at fingið gjørt eina kanning av, um og í hvussu stóran mun ósemjan var grundað í bardaganum millum progressivar og regressivar kreftir.

Sum greitt er frá omanfyri, samtykti Løgtingið í 1854 við stórum meiriluta at seta bann fyri at brúka tað agnið, sum línumenn brúktu. Hetta er eitt dømi um, at Løgtingið var afturlítandi og royndi at halda fast í tí gamla og forða nýhugsan. Tað eydnaðist kortini ikki, tí amtmaðurin vildi ikki seta forðingar fyri nýggja fiskiskapinum, og tí gjørdi Løgmálaráðið heldur ikki meira við spurningin. Í hesum døminum umboðar amtmaðurin saman við nøkrum fáum tingmonnum nýggju tíðina, meðan meirilutin royndi at halda seg til „gammel Skik." Tað má í hvussu er hava kenst eitt sindur svárt hjá tingmonnum, at amtmaðurin kundi forða fyri, at samtyktir teirra vórðu gjøgnumførdar, og hugsandi er, at henda og aðrar líknandi støður vóru við til at fylla krút á tunnuna. Tað er eisini sjáldsamt í hesi tíðini, at fólkavalt ting var meira konservativt, enn gamla embætisverkið hjá Einaveldinum var. Ein orsøk til tað var helst, at Løgtingið ikki varð endurstovnað orsakað av fólksligum kravi í Føroyum, men var úrslit av kollveltandi broytingum aðrastaðni. Við øðrum orðum var stovnsliga menningin í Føroyum framman fyri ta fólksligu menningina, og tað gevur føroyskari søgu hesa tíðina sín serliga dám.

### 17.7.1 Línan aftur til viðgerðar

Løgtingið fekk aftur í 1860 fleiri áheitanir um línufiskiskap. Dagin eftir ólavsøku vóru skriv frá Johannes Olsen og øðrum í Vestmanna og frá Berenti Johannesen og øðrum í Kollafirði løgd fram[514], og nakrar dagar seinni kom eitt skriv frá

514 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861. s. 140.



*Tá ið Løgtingið skuldi setast á middegi 23. august 1860, var tingsalurin mestsum tómur. Eitt mál á tingskránni henda dagin var álitið frá nevndini, sum hevði viðgjørt línuspurningin. Tað málið fall burtur, tá ið tingið fór heim. (Mynd: Tjóðsavnið 5074F05)*

fleiri havnarfólkum á tingborð[515], helst sum svar upp á hini bæði skrivini. Ein nevnd varð sett at viðgera línuspurningin, og í hana komu E.D. Bærentsen, Heine Heinesen og T.J. Kjelnes.

Nevndin ásannaði, at tað vóru sera ymiskar hugsanir um línuspurningin í Føroyum. Nøkur vildu hava línuna bannaða, onnur at avmarkingar vóru settar á línuna í tíð og stað, og uppaftur onnur vildu als ikki hava nakrar avmarkingar. Hugsanin í landinum hevði við øðrum orðum flutt seg síðani 1854, og nevndin hevði eisini eina øðrvísi fatan av spurninginum, enn Løgtingið hevði havt tá. Nevndin tók nevniliga ikki undir við einum fullkomnum banni, tí tað fór at taka eina góða inntøku frá fleiri fólkum, og tað fór at steðga øllum framburði. Nevndin helt heldur ikki, at tað var serliga væl prógvað, at tað var línan, sum gjørdi, at fiskurin hvarv á onkrum miðum, men hinvegin dugdi nevndin væl at síggja, at línan kundi forða fyri snørisfiskarínum, tí tað var so torført at fiska við snøri, har nógv lína stóð. Bara tvær línur á einum miði kundu forða øðrum fiskiskapi, og tí var nevndin samd í, at brúk var fyri reglum um tað. Støðan var broytt. Tingið vildi ikki longur banna línufiskiskapi, men hava reglur um, hvussu hesin fiskiskapurin skuldi skipast. Við øðrum orðum: Línan var komin fyri at verða.

---

515 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861. s. 146.

Nevndin vísti á tveir møguleikar at gera nakað við málið. Annar var at banna línuni ávísar árstíðir og á ávísum støðum. Hin var at gera eina áseting um, at línur skuldu setast soleiðis, at tær vendu sama veg, sum høvuðsstreymurin gekk. Á tann hátt fingu snørisbátar betri møguleikar at fiska við at lata seg reka við streyminum. Sjálv helt nevndin, at seinna uppskotið var tað betra, tí tað avmarkaði ikki frælsið á havinum líka álvarsamt sum hitt uppskotið. Nevndin helt kortini ikki, at tað nyttaði so nógv at gera nakað við henda spurningin, so leingi sum fremmandu fiskiskipini vóru tann veruligi trupulleikin. Tí vildi nevndin hava donsku stjórnina at senda eitt skip upp at verja ímóti hesum fremmanda fiskiskapinum. Nevndin skeyt tí upp, at løgtingið samtykti at útseta málið um línuna og at venda sær til Løgmálaráðið við áheitan um at senda eitt skip til Føroya at verja móti útlendsku fiskiskipunum[516]. Hetta álitið var nummar eitt á skránni hjá Løgtinginum til tingfundin 23. august 1860, men tað fall burtur, tá ið tingið fór heim.

**17.7.2 Spurningurin tikin uppaftur í 1861**

Av tí at tingið so brádliga helt uppat árið fyri, kom línuspurningurin aftur fyri í 1861. Tá var eingin nýggjur amtmaður settur, so fútin Hjalmar Finsen var virkandi løgtingsformaður. Á ólavsøku vórðu tey trý brøvini frá árinum fyri løgd fram aftur, men nú vóru fleiri onnur skriv eisini komin um sama spurning, og tilsamans komu í minsta lagi 10 skriv við hópin av undirskriftum úr øllum Føroyum[517]. E.D. Bærentsen skeyt 2. august upp at koyra hesi málini um línuna í eina serstaka nevnd. Uppskotið hjá Bærentsen ljóðaði: „At der i Sagen om Langlinefiskeriet nedsættes særskilt Udvalg“, og tað varð einmælt samtykt. 17 atkvøðuseðlar vóru til nevndarvalið, har 7 limir skuldu veljast[518]. Nevndarlimirnir gjørdust H.C. Müller sýslumaður við 14 atkvøðum, Pól Isaksen við 16 atkvøðum, P. Larsen við 16 atkvøðum, M. Danielsen við 15 atkvøðum, P.C. Weyhe við 15 atkvøðum, E.D. Bærentsen við 15 atkvøðum og A. Guttormsen við 16 atkvøðum[519].

Álitið frá hesi nevndini er tíverri ikki funnið, men alt bendir á, at tað var í tráð við álitið frá árinum fyri, og at nevndin vildi hava onkran serfrøðing uttanlands at siga sína hugsan, og at hon legði dent á, at tað var fremmandi fiskiskapurin, sum var trupulleikin. Undir øllum umstøðum eydnaðist tað at fáa eitt samt Løgting at taka undir við málinum, sum varð samtykt við 19 atkvøðum fyri og ongari ímóti 26. august 1861. Til aðru viðgerð komu M. Danielsen og P.C. Weyhe við einum broytingaruppskoti, sum setti avmarkingar á línufiskiskapin

516 TSS. Løgtingið. Løgtingsmál, 1859-1860. Álit frá løgtingsnevnd at viðgera ymisk mál dagfest 19. august 1860.

517 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861. s. 161-163.

518 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861. s. 167.

519 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861. s. 168.

eina ávísa árstíð. Hetta uppskotið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti, og tað hevði við sær, at bert 13 atkvøður vóru fyri samlaða uppskotinum, meðan tríggjar atkvøður vóru ímóti[520]. Sostatt var mótstøðan móti línuni ikki heilt burtur, sjálvt um dentur nú varð lagdur at flyta trupulleikan yvir á fremmandar serfrøðingar og fremmand fiskiskip. Fútin sendi álitið og allar áheitanirnar víðari til Løgmálaráðið. Hann boðaði frá, at hann var púra samdur við meirilutan í nevndini, men hann nevndi einki um samtykta broytingaruppskotið[521].

## *17.8 Fugloyingar royna eina seinastu ferð at mótmæla línuni*

Nærum fýra ár gingu, áðrenn nakar fremmandur serfrøðingur kom at kanna fiskivinnuna í Føroyum, og meðan bíðað varð, órógvaði línan framvegis fólk, serliga fólk á brimplássum. Tveir fugloyingar skrivaðu 16. juli 1863 til Løgtingið og spurdu, um tað skuldi vera so, at tann fyrsti báturin, sum kom á eitt mið, skuldi hava rættin tann dagin, og hinir so noyddust at fara aðrastaðni at royna. Var hetta støðan, var tað ein stórur trupulleiki fyri brimpláss, tí har var so knortlut at draga bát, at teir ongantíð kundu gerast teir fyrstu á miðini, og tíðin loyvdi teimum ikki at fara langa leið. Tí føldu teir seg púra avskornar frá at kunna fiska, tá ið gomlu fiskimiðini vóru hegnað inni við línum, áðrenn teir komu á fiskileið. Teir vildu tí hava onkur góð ráð frá Løgtinginum, sjálvt um teir vistu, at Løgtingið ikki í løtuni var ført fyri at gera meira við nakra lóg[522].

Ein løgtingsnevnd viðgjørdi málið og ásannaði, at talan var um ein trupulleika, sum okkurt skuldi gerast við, men tað hevði fyri tíð síðani heitt á Løgmálaráðið um at gera okkurt, og tað fór vónandi at henda skjótt. Fyribils noyddist Løgtingið bara at svara, at soleiðis var støðan, og sjálvt hevði Løgtingið ikki heimild til at gera nakra lóg um hesi tingini[523].

Árið eftir skrivaðu 15 mans á Kirkju bræv til Løgtingið. Hetta væl orðaða skriv kom eisini av, at teir á hesi lítlu oynni føldu seg umringaðar av línu. Teir føldu, at línan oyðilegði fiskiskapin hjá teimum. Fyrr í tíðini bar til hjá manni á Kirkju av landi at blaka snøri út og fáa nakrar fiskar, men tað hevði ikki borið til, síðani línurnar komu kring oynna. Teir ásannaðu, at „ingen hader sit eget

520 TSS. Løgtingið. Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol III Begyndt 16de August 1861 Endt den 31 Juli 1868. s. 28.

521 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, nr. (einki). Bræv til Løgmálaráðið dagfest 12. oktober 1861. Áheitanirnar og álitið, sum ikki er at finna í skjalasavninum hjá Løgtinginum, er helst at finna á Ríkiskjalasavninum, har hetta málið er arkiverað. Tað er ikki funnið í sambandi við hesa ritgerðina.

522 TSS. Løgtingið. Løgtingsmál, 1863-1864. Bræv frá Elias Petersen og Rasmus Olesen dagfest í Hattarvík 16. juli 1863.

523 TSS. Løgtingið. Løgtingsmál, 1863-1864. Álit frá løgtingsnevnd at viðgera ymisk mál dagfest 12. august 1863. Í nevndini vóru E.D. Bærentsen, A.C. Lützen og P.C. Weihe.

Kjød, men føder og sørger for det, men det bør heller ikke til side settes naar det gjelder at alle og enhver bør ogsaa tage hensyn til andres bedste." Hetta síðsta „kunne vi langtfra ikke erkjende at finde Sted ved brugen af Langlinefiskerie", tí fyrr kundu nógvir bátar fiska á einum miði, og allir fingu væl av fiski, men nú kundi ein bátur hegna eina heila grynnu inn í línu. Bestu grynnurnar kring Fugloynna kundu hegnast inni av 2 ella 3 bátum.

Viðmerkingarnar frá fugloyingunum eru eitt gott dømi um, at ein grundleggjandi hugburðsbroyting var partur av, at fiskiskapurin í so stóran mun var lagdur um til línu. Línufiskiskapurin bygdi á nýggja kapitalistiska hugburðin um at fiska nógv og vinna so góða úrtøku, sum til bar. Eftir sótu fugloyingarnir við felagsskapshugburðinum í gamla samfelagnum, har atlit vóru tikin til, at øll skuldu klára seg. Landafrøðin forðaði fugloyingunum at taka lut í línufiskiskapinum í líka stóran mun, sum aðrir gjørdu. Tað er eitt dømi um, at nýggjar vinnur ofta í longdini elva til demografiskar broytingar, og slíkt trýst hevur ofta ósemjur við sær.

Fugloyingarnir vístu á orðatakið um, at semja byggir, meðan ósemja brýtur niður. Tá ið fiskað varð við snøri, var eingin ósemja, men nú vóru nógv skeldsorð søgd millum bátsmanningar, og viðhvørt var tað líka við, at talan gjørdist um bardaga. Í teirra eygum var týðiligt, at tað vóru teir sterku, sum fingu sær línu, men tann fátæki sat eftir við snørinum, tí hann hevði ikki ráð at ofra so nógv, sum skuldi til at keypa eina línu, tí um hon hvarv dagin eftir, stóð hann nógv verri í tí. Tí vónaðu teir, at Løgtingið fór at taka atlit til teirra tørv og hjálpa teimum at leita sær inntøkuna lógliga. Um Løgtingið ikki sjálvt fekk gjørt nakað, skuldi tað skriva niður til málaráðið sum skjótast, so at landaskil aftur kom á[524].

Aftur hesa ferð svaraði tingið, at meiningarnar um línufiskiskap vóru ymiskar, men málið var lagt fyri Løgmálaráðið, sum vónandi var í ferð við at gera okkurt við tað. Tí kundi Løgtingið ikki gera meira við spurningin enn[525].

## *17.9 Norskur serfrøðingur mælir frá avmarkingum*

Tá ið Løgtingið svaraði fugloyingum, var Løgmálaráðið ikki rættilig komið í gongd við at gera meira við spurningin, men í skrivi 31. mars 1865 heitti tað á norska premierloytnantin Didrik Hegermann Rye um at gera eina frágreiðing um fiskivinnu í Føroyum. Í sambandi við hesa frágreiðing var Rye í sjey vikur í Føroyum hetta summarið og vitjaði týdningarmiklastu fiskivinnuplássini, og í november var hann klárur at skriva Løgmálaráðnum eina frágreiðing (Rye 1866: 3). Rye greiddi frá somu tingunum, sum Løgtingið hevði viðgjørt nakrar ferðir, og hann sá, at tvístøðan í Føroyum var júst tann sama, sum hevði verið

524 TSS. Løgtingið. Løgtingsmál, 1863-1864. Bræv frá 15 fugloyingum dagfest á Kirkju 23. juli 1864.

525 TSS. Løgtingið. Løgtingsmál, 1863-1864. Álit frá løgtingsnevnd at viðgera ymisk mál dagfest 6. august 1864. Í nevndini sótu Z. Nielsen, Johan Olesen og J. Joensen.



*Fugloyingar vóru ørkymlaðir, tá ið teir skrivaðu Løgtinginum bræv 23. juli 1864. Sambært teimum elvdi línan bara til ósemju, tí hon var til fyrimuns fyri tann sterka, meðan tann fátæki varð verri fyri.*

í Noregi, serliga í Lofoten, tá nakrir fóru at brúka línu har, og seinni aftur tá ið garn gjørdist vanligari veiðuamboð. Stríðið millum veiðuhættir var ikki nakað serføroyskt fyribrigdi, men var væl kent aðrastaðni.

Hann helt, at tað serliga var misnøgd við, at aðrir brúktu betri amboð, sum gjørdi, at snørismenn klagaðu um línufiskiskapin. Harumframt kom, „for en ikke ringe Grad den hos Søbonden – og fornemmelig paa saa isolerede Steder som Færøerne – endnu mere end hos Almuen i Almindelighed sædvanlige Uvillighed imod nye Indretninger og Redskaber, imod Alt, hvad der ikke stemmer med nedarvede Sædvaner.“(Rye 1866: 10).

Hesin tvídrátturin hevði í Noregi gjørt, at fleiri ásetingar gjøgnum tíðirnar vóru settar í verk at verja snørisfiskiskapin, men fyri Lofoten vórðu allar hesar avmarkingar avtiknar við lóg 23. mai 1857. Nú var reglan tann, at „Enhver bør have Ret til paa Søen at søge sit Erhverv med de Redskaber, han kan skaffe sig, og som han finder tjenligst.“ Almúgunnar vanahugsan hevði elvt til nógva mótstøðu móti hesari frælsisgerðingini, og fleiri privat uppskot vóru løgd fyri Stórtingið, og tí sat ein nevnd í Noregi, sum skuldi taka støðu til hesar spurningar, men nú var tvídrátturin serliga millum línu og gørn, tí snørismenn høvdu við tíðini vant seg við at arbeiða við síðuna av øðrum nýggjum veiðuhættum (Rye 1866: 11).

Rye ivaðist tí ikki í, at „Haandsnøre-Fiskeren“ eisini í Føroyum við tíðini fór at venja seg við nýggju umstøðurnar (Rye 1866: 12). Tí var hansara niðurstøða eisini, at „der ikke kan antages at være Føie til af Omsorg for Fiskeriet i det Hele at træffe nogen af de som ovenanført af Haandsnøre-Fiskeren begjærte Lovregler.“(Rye 1866: 9).

Sostatt fekk mótstøðan móti línuni ongan stuðul uttan úr heimi. Rye ivaðist ikki í, at føroyingar fóru at venja seg við nýggju tíðina, soleiðis sum fólk høvdu gjørt aðra staðni, og tí var ikki neyðugt hjá myndugleikunum at gera meira við málið. Okkurt bendir á, at donsku myndugleikarnir vóru fegnir um hesa niðurstøðuna, tí Løgmáláráðið mælti til, at Rye fekk riddarkrossin fyri arbeiði sítt í Føroyum. Rye varð sama ár, sum hann skrivaði frágreiðingina um fiskivinnu í Føroyum, settur í starv í norska vitaverkinum, og har varð hann stjóri frá 1882 til 1909.

Sum tíðin gekk, fóru fleiri og fleiri bátar at fiska við línu, men so seint sum í 1887 fekk Løgtingið áheitan um at banna línuni, tí hon var skaðilig fyri fiskin, og í 1913 var spurningurin aftur frammi, tí hildið varð, at línan var orsøkin til, at fleiri bátar gingu burtur, tá illveður brádliga kom á teir. Hildið varð, at tað hevði ikki hent, um bátarnir fiskaðu við snøri, og tí vildu nøkur avtaka línuna. Sjálvt um nógvar áheitanir soleiðis komu um tað í meir enn hálva øld, so komu ongantíð nakrar forðingar fyri hesum fiskireiðskapi (Joensen 1946: 40). Tí slapp fiskivinnan at halda fram at menna seg og broyta samfelagið grundleggjandi.



Betænkning

om

Fiskeriforholdene paa Færøerne,

afgiven til Justitsministeriet

af

D. H. Rye,

Premierlieutenant i den kgl. norske Marine.

Kjøbenhavn.

Trykt hos J. H. Schultz.

1866.

*Drúgva málið um línuna í Løgtinginum endaði við, at ein útlendskur serfrøðingur varð biðin um at siga sína hugsan um málið. Frágreiðingin hjá norska premierloytnantinum Didrik Hegermann Rye kom út í 1866. Hann hevði verið í Føroyum í sjey vikur og kanna málið, og hann helt ikki, at tað á nakran hátt gagnaði fiskivinnuni at taka undir við teimum uppskotunum, sum snørismenn høvdu lagt fram.*

## *17.10 Amtmaður staðfesti, at fiskivinna var týdningarmiklasta vinnan*

Eftir at Dahlerup amtmaður á heysti 1860 fór til Danmarkar at umboða Føroyar í Landstinginum, kom hann ongantíð aftur. Hann átti at farið aftur til Føroya við „Arcturus“ 1. mars 1861, men privat viðurskifti gjørdu, at hann søkti um at fáa longt um tíðina í Keypmannahavn[526]. Orsøkin var uttan iva, at framtíð hansara sum amtmaður í Føroyum var óviss, og hann vildi helst vera hjástaddur, meðan hon varð avgjørd. Dahlerup var kortini framhaldandi amtmaður til 12. september 1861, tá ið Finsen fúti varð settur sum fyribils amtmaður, eftir at Dahlerup hevði fingið nýtt embæti[527].

Meðan Dahlerup var í Keypmannahavn, røkti Jens Davidsen uppgávur hansara í Føroyum. Tí er eitt sindur óvist, hvør av teimum eigur hvat í frágreiðingini um landsins støðu, sum amtmaðurin sendi myndugleikunum í februar 1861. Í hesi frágreiðing ásannaði amtmaðurin, at fiskivinnan „upaatvivleligt maa ansees for at være Færingernes vigtigste Næringsvei“. At fiskivinnan sum heild hevði givið

526 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, nr. (einki). Bræv til Løgmálaráðið dagfest 23. februar 1861.
527 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, nr. (einki). Bræv til Løgmálaráðið dagfest 7. oktober 1861.

minni í 1860 enn árið fyri, komst av vánaligum veðri, sum skjótt avmarkaði møguleikarnar at virka við útróðrarbátum, og tað fekk amtmannin til at taka uppaftur gamla spurningin um at fáa føroyingar at fara undir havfiskiskap.

Ein onnur orsøk til, at amtmaðurin tók henda spurning upp, var helst, at á heysti 1860 hevði ein breti, sum átti fleiri skip, og sum í fleiri ár hevði fiskað kring oyggjarnar, búsett seg í Føroyum. Tað hevði tí verið ynskiligt, at føroyingar kundu brúkt hann sum fyrimynd at fara undir fiskivinnu við skipum[528].

H.C. Müller sýslumaður, sum tíðliga royndi seg sum klippfiskaframleiðara, sum greitt er frá í kapitli 16.2.4, hevði um júst somu tíð eisini tikið stig til at fáa fatur á einum deksfari at reka havfiskiskap. Hann sendi Ríkisdegnum eina umsókn um at fáa stuðul til hesa ætlan, tá ið fíggjarlógin fyri árið 1861-62 var til viðgerðar. Tað gav Dahlerup amtmanni høvi til at greiða nærri frá sínum sjónarmiði um fiskivinnu við skipi, og í tí sæst, at sjálvt um vinnuligi útróðurin hevði broytt so mangt og hevði gjørt, at fiskivinnan nú var týdningarmiklasta vinnan í landinum, so var støðan so at siga tann sama havfiskiskapinum viðvíkjandi í 1861, sum hon hevði verið 30 ár frammanundan.

Fremmandu skipini vístu framvegis, at føroyingar als ikki fingu nóg mikið burtur úr fiskivinnuni, tí útróðrarbátarnir høvdu so stórar avmarkingar. Bátsmanningarnar brúktu nógva tíð til at rógva aftur og fram av miðunum, meðan skipini kundu liggja og fiska alla ta tíðina, fiskur var at fáa. Dahlerup helt, at tað serliga vóru tvey ting, sum gjørdu, at føroyingar ikki fingu gongd í skipsfiskiskap. Annað var, at skip vóru so dýr, at føroyingar ikki megnaðu at savna kapital til bæði skip og rakstur. Tann, sum átti kapital, valdi at keypa jørð heldur enn at váða hann í fiskiskipi, sum ikki kundi tryggjast.

Ein onnur avgerandi orsøk var, „Færingernes vedhængen ved gammel Skik og Sædvane“. Føroyingar høvdu framvegis mistrúgv á alt nýtt og hildu, at „saaledes som hans Fader og Forfædre have baaret dem ad, saaledes troer han, er den eneste rigtige Maade at bære sig ad paa.“ Harumframt høvdu føroyingar lítlan hug til at vera heimanífrá, og tað helt Dahlerup var mest avgerandi orsøkin til, at føroyingar ikki vildu fáast við deksfør. Hugurin at vera heimanífrá var bara blivin minni, eftir at tað fór at bera til at fáa pening í hondina fyri ráfiskin. Fleiri royndir vóru gjørdar at fáa føroyingar umborð á deksfør, og í pappírunum hjá Pløyen hevði Dahlerup sæð, hvussu torført tað var hjá honum at finna fólk til kongligu royndarskipini. Seinni høvdu føroyingar sjálvir fingið stuðul til at keypa fiskiskip, men hugurin at fiska var lítil, og tí endaði skipið við at fara í fraktfart. Aðrar stuðlaðar ætlanir vóru strandaðar orsakað av ósemjum, vantandi evnum o.ø.

Sjálvt um allar ætlanir higartil sostatt høvdu víst seg at miseydnast, so helt Dahlerup, at tað almenna framvegis skuldi stuðla slíkum átøkum, tí „Dersom Færingernes Fasthængen ved gammel Sædvane skal overvindes, vil det kun kunne skee ved et af Færinger afgivet Exempel“. Tí vildi hann hava, at ætlanin

528 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, nr. (einki). Bræv til Løgmálaráðið um landsins støðu dagfest 16. februar 1861.



*H.C. Müller sýslumaður søkti í 1860 um at fáa stuðul til eitt deksfar, sum skuldi reka havfiskiskap. Tað gav Dahlerup amtmanni møguleikan at gera eina meting av, hvussu til stóð í menningini av fiskivinnuni. Amtmaðurin ásannaði, at fiskivinnan mátti metast at vera týdningarmiklasti vinnuvegurin í Føroyum, men samstundis endurtók hann, at tað serliga vóru tvey viðurskifti, sum gjørdu, at føroyingar enn ikki vóru farnir at fiska við skipi. Ein orsøk var, at ov lítil kapitalur var í landinum, og hin var „Færingernes vedhængen ved gammel Skik og Sædvane". Nógv var broytt, men enn var nógv eftir at gera. (Mynd: Tjóðsavnið 5101F036)*

hjá Müller um at stovna eitt fiskivinnufelag skuldu stuðlast. Ein fyrimunur nú í mun til frammanundan var, at nú var Einahandilin avtikin við øllum teimum fyrimununum, tað átti at givið eini slíkari privatari ætlan. Á fíggjarætlanini var stuðul til tvey skip, men fiskimenninir handan tað eina høvdu, sum amtmaðurin skilti tað, bakkað út aftur. Passaði tað, vildi hann fegin hava, at Müller fekk peningin í staðin[529].

Grundgevingarnar hjá Dahlerup amtmanni líkjast í stóran mun teimum grundgevingunum, sum vóru frammi í 1830- og 40-árunum. Tað er ikki sørt margháttligt at síggja, júst um somu tíð sum amtmaðurin kundi staðfesta, at fiskivinnan „maa ansees for at være Færingernes vigtigste Næringsvei". Amtmaðurin fekk kortini rætt í, at tað, sum skuldi til, var, at onkrir føroyingar gingu undan og vístu vegin fram. Tað hendi góð 10 ár seinni, tá ið nakrir av teimum, sum høvdu róð út vinnuliga í fleiri ár, tóku stigið víðari og keyptu sær eina slupp (Degn 1929: 51–52). Vinnuligi útróðurin var fortreyt fyri føroyskum havfiskiskapi.

## *17.11 Samandráttur*

Fólkaræðið gjørdi enda á einaveldistíðini í 1849, og ein avleiðing av hesi kollvelting var, at Løgtingið varð endurstovnað í 1852. Júst um somu tíð eydnaðist tað umsíður at fáa føroyingar at taka vinnuligu fiskivinnuna rættiliga til sín, og tað sást aftur, tá ið privatir av álvara fóru undir at virka klippfisk í 1853. Vøksturin í privata áhuganum fyri fiskivinnuni gjørdi, at tey vórðu alsamt fleiri, sum fingu

529 TSS. Færø Amt. Kopibók NN, nr. (einki). Bræv til Løgmáláráðið dagfest 15. mars 1861.

somu áskoðan um møguleikarnar í nýggju vinnuni, sum amtmaðurin leingi hevði havt. Talið á teimum, sum sóu fyri sær, at fiskivinnan var framtíð Føroya, vaks, og hjá amtmanninum ráddi tí mest um at nýta sína støðu at stuðla teimum.

Við nýggju politisku skipanini var umráðandi at vinna fólksliga undirtøku fyri sjónarmiðinum. Í Havn høvdu fólk longu vant seg við, at klippfiskavirkingin var eitt avgerðandi inntøkugrundarlag, so har var eingin ivi í stuðlinum til nýggju vinnuna. Verri gekst at fáa stuðul á bygd, tí bygdirnar vóru í nógv størri mun grundarlagið undir gamla bóndasamfelagnum, og tí var torførari at vinna undirtøku fyri nýggju sjónarmiðunum har.

Línan var grundleggjandi tøkniligt framstig í nýggju vinnuni, og hon broytti aldagamla útróðurin og legði trýst á bygdarsamfeløgini. Tí vaks mótstøðan móti vinnuliga útróðrinum, so hvørt sum meira og meira varð gjørt við línuveiðuna. Henda nýggja vinna býtti fólkið í tvey, og øll tey nógvu mótmælini og mótmótmælini móti línuveiðuni eru greitt tekin um, at fólk gingu høgt upp í henda spurningin. Tí var tað mestsum sjálvsagt, at spurningurin gjørdist týdningarmikil, tá ið fólkavalda Løgtingið fór undir sítt virksemi. Fólkaræðisligi meirilutin samtykti í 1854 at seta forðingar fyri nýggju vinnuni, men amtmaðurin mælti frá at ganga hesum ynski um at steðga framburðinum á møti. Danska stjórnin tók undir við amtmanninum og valdi ikki at gera, sum fólkavaldu umboðini í Løgtinginum høvdu samtykt.

Um menningin av fiskivinnuni hevði steðgað eina tíð, um danska stjórnin tók eina øðrvísi støðu, er torført at siga, men avgerðin hjá stjórnini gjørdi, at menningin slapp at halda fram, og tá ið spurningurin fá ár seinni aftur varð lagdur fyri tingið, var fiskivinnan so nógv ment, at Løgtingið ikki longur vildi ganga við til at banna línufiskiskapi. Fiskivinnan var komin fyri at verða, nú ráddi bara um at skipa hana, so at hon gagnaði so nógvum og var so fáum til bága, sum til bar. Reglur skuldu finnast, so pláss var fyri bæði línu og snøri.

Mótstøðan móti nýggju vinnuni fánaði, so hvørt sum tað gjørdist greitt, at fiskivinna var vorðin týdningarmiklasta vinnan í landinum, og at enda vóru tað bara menn á ytstu brimplássum, sum mótmæltu, tí landafrøðin gjørdi, at teir ikki høvdu líka góðar møguleikar at gagnnýta nýggju møguleikarnar, sum onnur høvdu. Høvuðstrupulleikin gjørdist aftur sami fremmandi fiskiskapurin, sum upprunaliga setti gongd í allan spurningin í 1832, og tá ið amtmaðurin aftur mælti til, at føroyingar fingu stuðul, so at teir á egnum skipskjøli kundu taka kappingina móti fremmandu fiskiskipunum upp, var tað sum um søgan byrjaði umaftur, tí tað var júst tað sama, sum Tillisch skeyt upp smá 30 ár frammanundan. Munurin var bara, at nú var vinnuligi útróðurin vorðin týdningarmiklasta vinnan í Føroyum, og tað var hann, sum seinni gjørdist grundarlagið undir føroyskum havfiskiskapi.

# *4. partur Niðurstøða og keldur*

# 18. kapittul
# *Niðurstøða*

Endamálið við hesi ritgerð var at kanna pástandin um, at amtmansstovnurin var avgerandi moderniseringsagenturin í Føroyum fyrra partin av 19. øld. Tað skuldi gerast við at kanna leiklutin, sum amtmaðurin hevði í at menna eina fiskivinnu í Føroyum, tí einki er at ivast í, at fiskivinnan var vinnu- og búskaparliga grundarlagið undir teimum stóru broytingunum, sum hendu í føroyska samfelagnum.

Vanlig liberalistisk fatan vil vera við, at gongd kom í menningina av einari fiskivinnu, tá ið handilin var liberaliseraður í kjalarvørrinum á stóru politisku broytingunum í sambandi við, at grundlógin varð samtykt í 1849. Ta fatanina verður gjørt upp við í hesi ritgerðini. Tað var amtmaðurin, sum tók stig til at menna eina føroyska fiskivinnu, tí hon skuldi brúkast sum eitt transformatiónsamboð. Fiskivinnan skuldi við øðrum orðum slóða fyri og verða grundarlagið undir einari kapitalistiskari skipan, heldur enn umvent.

Ein av avgerandi orsøkunum til, at farið varð undir at kanna fiskivinnuna sum moderniseringsamboð hjá amtmanninum, var ástøðið hjá Acemoglu et.al. (2012) um, at tað hevur týdning at kanna broytingar í politiskum og búskaparligum stovnum, tá ið finnast skuldi fram til, hví nakrar tjóðir komu inn á eina inklusiva rás við áhaldandi menning, meðan aðrar vórðu verandi á einari ekstraktivari rás, sum fyrr ella seinni fór at hava við sær, at tjóðin „failed". Hetta ástøðið gav góðar møguleikar at síggja amtmansstovnin sum ein nýggjan politiskan stovn, sum fekk stóran týdning í tí avgerandi vegamótinum, sum skiftið frá bóndasamfelag til modernað kapitalistiskt samfelag var í stórum pørtum av heiminum. Samstundis gjørdi ástøðið tað greiðari at greina Einahandilin og bygdarfelagsskapin sum gomlu stovnarnar í ekstraktiva bóndasamfelagnum, sum helst onga broyting vildu hava.

Ein vansi við, at so stórur dentur í ástøðinum hjá Acemoglu et.al. verður lagdur á nýggjar stovnar, er í hesi ritgerð, at tað verður amtmaðurin, sum alla tíðina verður í miðdeplinum í granskingini. Tá ið keldutilfarið longu frammanundan í stóran mun stavar frá amtmanninum sjálvum, meðan lutfalsliga lítið er til av øðrum keldum, er vandi fyri, at leikluturin hjá amtmanninum fær ov stóran týdning í tulkingini av moderniseringstilgongdini. Við kolonisøguligu metoduni er roynt at forða fyri hesum vandanum í kelduviðgerðini, men tað kundi verið áhugavert at gjørt greiningar av samfelagsligu broytingunum í moderniseringini, har dentur varð lagdur á at kanna aðrar politiskar og búskaparligar stovnar. Dømið úr Hetlandi vísir, at tað hevði stóran týdning, hvør átti jørðina, og hvussu jarðarviðurskiftini vóru skipað. Ein slík komparativ greining er ikki gjørd av føroysku ognarviðurskiftunum, men tað er ikki óhugsandi, at tey kunnu hava havt týdning fyri moderniseringina.

Harumframt hevði verið áhugavert at kannað, um bóndasamfelagið og bygdarfelagsskapurin vórðu løgd undir trýst av øðrum faktorum enn amtmansins virksemi, sum t.d. øktum fólkatali og menning av øðrum almennum stovnum. Av almennum stovnum kundi serliga bygdarskúlin verið áhugaverdur, tí hann hevði við sær, at ein lærari, ofta við einari familju, skuldi virka inni í og liva av bygdarfelagsskapinum uttan at vera partur av arbeiðsbýtinum í felagsskapinum. Lærarin var á tann hátt eitt umboð fyri nýggju tíðina mitt inni í teirri gomlu skipanini, og tí ítøkiliggjørdi lærarin eina týðiligast tvídráttin millum gamalt og nýtt.

Traditionalisman var innari parturin av javnvágsfelluni, sum Thráinn Eggertsson nýtti at greiða frá, hvat tað var, sum forðaði fyri búskaparligari menning í Íslandi, har ytri parturin var eitt veikt statsvald. Eggertsson (1996) nýtti ástøðið um javnvágsfelluna at greiða frá, hvat forðaði fyri modernisering í Íslandi, og tá Føroyar og Ísland á so mangan hátt hava havt eina felags søgu, passaði henda ástøðiliga fatanin væl til tað, sum skuldi kannast í hesi ritgerðini. Harumframt hóskaði hon væl saman við ástøðið hjá Acemoglu et.al., tí meðan tað ástøðið mest snúði seg um, hvør rás varð vald burtur úr einum avgerandi vegamóti, snýr ástøðið um javnvágsfelluna seg um tær forðingarnar, sum gjørdu, at tað var torført at koma fram til vegamótið.

Í Føroyum kom javnvágsfellan rættiliga til sjóndar við merkantilistiska handilspolitikkinum hjá Kristiani 4. tíðliga í 17. øld. Bundnar hosur vístu seg at vera góð útflutningsvøra hjá ríkinum, men hosubindingin gav eisini føroyingum møguleika at umseta arbeiðsorku til pening, og tað gjørdi støðuga bóndasamfelagið uppaftur støðugari. Á tann hátt var hosuframleiðslan við til at styrkja um javnvágsfelluna, tí hon var til fyrimuns fyri bæði veika statin og bóndastættina.

Henda støðan broyttist ikki, tá ið handilin fekk undirskot av hosuútflutninginum síðst í 17. øld, og tá ið undirskot vendist til yvirskot í 18. øld, samstundis sum fastur prísur var á øllum vørum í nærum 100 ár, økti tað bæði um traditionalismuna í bóndasamfelagnum og um megina í javnvágsfelluni. Bæði í Íslandi og Danmark hendu nýskipanir í 1780-árunum, og tá ið Einahandilin í Føroyum um somu tíð fór at geva kongsins kassa undirskot, var ætlanin at avtaka Einahandilin, eins og gjørt varð í Íslandi. Trýst úr Føroyum tryggjaði, at hesar ætlanirnar vórðu sleptar aftur.

Ein orsøk til, at stórar broytingar kundu fremjast í Íslandi, meðan tað ikki eydnaðist at gera somu broytingar í Føroyum, var náttúruvanlukkan við Skaftáreldunum, og ein onnur orsøk var, at tann stiftamtmaðurin, sum Føroyar og Ísland høvdu havt í felag, búsettist á Bessastøðum í 1770. Tað hevði við sær, at almenna skipanin varð styrkt í Íslandi, og harvið viknaði ytri parturin av javnvágsfelluni har. Náttúruvanlukkan gjørdi enda á innara partinum av javnvágsfelluni, tí landbúnaðurin í Íslandi varð í stóran mun lagdur í oyði, og bøndurnir høvdu tí einki at verja longur. Í Íslandi var bara eitt at gera, og tað var at byggja upp eitt nýtt samfelag. Í Føroyum var bóndastættin líka sterk, sum hon leingi hevði

verið, men ein avleiðing av, at stiftamtmaðurin búsettist á Bessastøðum, var, at almenna skipanin viknaði í Føroyum, og tí varð javnvágsfellan í Føroyum styrkt um somu tíð, sum hon syndraðist í Íslandi.

Í Føroyum var ikki væntandi, at nakað eldgos fór at skapa umfatandi broytingar, og heldur eingi útlit vóru til, at nakað krav um broytingar fór at koma frá føroyingum sjálvum. Kreativ niðurbróting fór neyvan at henda uttan ávirkan uttanífrá. Tí kundu broytingarnar bara koma úr erva, og skuldi tað henda, skuldi almenna skipanin í Føroyum verða styrkt. Í restini av ríkinum vóru tað amtmenninir, sum tóku sær av, at nýskipanir hjá miðfyrisitingini vórðu gjøgnumførdar kring landið, men í Føroyum var eingin amtmaður at taka sær av hesari uppgávu. Føroyar vóru í amtskipanini ein viðfáningur millum mongu uppgávurnar hjá Sælands stiftamtmanni, sum helst vildi sleppa undan uppgávuni at virka sum amtmaður fyri Føroyar.

Henda skipanin broyttist so líðandi, meðan napoleonskríggini herjaðu, og í 1816 varð kommandanturin á Skansanum fyribils settur sum amtmaður í Føroyum. Einki bendir á, at hesar broytingar høvdu nakað serligt samband við eitt ynski frá myndugleikunum um at modernisera Føroyar. Heldur var tað so, at bæði henda broytingin í 1816 og stovnanin av einum sjálvstøðugum Færø amt í 1821 hendu í sambandi við starvssetanir av Sælands stiftamtmanni. At nýskipanir ikki lógu fremst í huga hjá myndugleikunum, tá ið amtsskipanin varð broytt, sást eisini í valinum av fyrsta amtmanninum í Føroyum. Løbner kommandantur var hernaðarmaður, og júst sama ár, sum hann gjørdist rættiligur amtmaður, komu reglur í gildi, sum søgdu, at allir amtmenn skuldu hava løgfrøðiliga útbúgving. Løbner var tí helst tann seinasti hernaðarmaðurin í øllum ríkinum, sum gjørdist amtmaður.

At amtmenn skuldu hava løgfrøðiliga bakgrund var eitt úrslit av teimum mongu lógunum, sum vóru komnar í kjalarvørrinum á nýskipanunum síðstu áratíggjuni av 18. øld. Amtmenninir skuldu gjøgnumføra nýskipanirnar, og tí kom ikki verulig gongd á hesar nýskipanir í Føroyum, fyrr enn ungi løgfrøðingurin C.L. Tillisch avloysti Løbner í 1825. Henda søgan vísir, at tað ikki er nóg mikið at vísa á stovnsligar broytingar, tá ið greiðast skal frá moderniseringsgongdini, tí tað avgerandi vísti seg at vera, hvørjir persónar komu at mynda stovnarnar. Við øðrum orðum røkka strukturellar broytingar bara eitt vist, og hugsjónir og rák í tíðini, sum persónarnir í stovnunum umboða, eru avgerandi fyri samlaðu søguna.

Í einum máli um eitt fiskiskip, sum var farið at flyta vørur ólógliga til landið, sást, at nýggi amtmaðurin ikki hevði líka góðan hug at avbyrgja landið, sum undanfarni amtmaðurin hevði havt. Nýggi amtmaðurin, C.L. Tillisch, helt ikki líka fast í tí, sum eyðkendi veika statin í javnvágsfelluni, og hann fór eisini undir at stovna nýggjar almennar stovnar sum sjúkrahús, bókasavn og skúlagrunn. Tað vóru alt tekin um, at staturin ikki longur var so veikur í Føroyum, og tí viknaði statsins partur í javnvágsfelluni.

*Klippfiskavirkingin í Álakeri gav mongum smádreingi møguleikan at tjena nøkur oyru. (Mynd: Tjóðsavnið 3350F02634)*



At staturin hevði fingið ein øðrvísi leiklut í Føroyum, sást eisini, tá ið triði amtmaðurin, F.F. Tillisch, skuldi taka støðu til, hvat gerast skuldi við útlendsku fiskiskipini kring Føroyar. Heldur enn at seta upp forðingar fyri hesi skip mælti hann til at taka kappingina upp ímóti teimum og menna eina rættiliga fiskivinnu. Á sama hátt helt hann, at besta verjan ímóti loynihandli var ikki at laga verjugarðar, men at menna Einahandilin, so ongin tørvur var á at fáast við ólógligan handil. Hann fór við øðrum orðum burtur frá einum politikki, har tað ráddi um at verja støðuga føroyska samfelagið móti nýggjari ávirkan uttaneftir, til ein politikk, har endamálið var at menna landið, so tað kundi samanberast við grannalondini. Nógv tað besta amboðið at brúka í hesi menningini var ein nýmótans fiskivinna.

Tillisch sá henda møguleika, men hann var sannførdur um, at vegurin fram fyrst og fremst var at fáa fólk at taka undir við borgarligu hugsjónunum. Eydnaðist tað, fóru borgarar skjótt at seta gongd á eina fiskivinnu, og tí átti tað almenna ikki at blanda seg stórvegis í skapanini av einum borgarligum samfelag. Tillisch vildi hava, at borgarastættin í Føroyum sjálv stóð á odda at menna nýggja vinnu, og tí tók hann saman við øðrum stig til at stovna eitt felag fyri borgarar nevnt „Landhuusholdnings-selskabet for Færø Amt". Hetta felag tók stig til at stuðla klippfiskaframleiðslu, og tað var helst eisini í hesum felagnum, at hugskotið kom

til at byggja eitt deksfar, sum skuldi virka sum fyrimynd í strembanini eftir at menna eina fiskivinnu í landinum.

Ætlanin við fiskifarinum miseydnaðist, og sum heild eydnaðist ikki at seta gongd á nakra fiskivinnu við borgarligum initiativi sum grundarlagi. Hinvegin gjørdi skipsætlanin hjá Tillisch, at ein lánimøguleiki til fiskiskip gjørdist partur av nýggjari fyriskipan fyri handilin 20. apríl 1836. Tá hevði Tillisch sjálvur mist vónina um, at tað fór at eydnast at menna fiskivinnu í Føroyum, men aðrir trúðu framvegis upp á henda møguleika. Bæði Pløyen fúti og Hunderup sorinskrivari hildu, at fiskivinnan skuldi stuðlast, tí tað var besti og møguliga einasti mátin at lyfta landið upp á eitt stig, har til bar at avtaka Einahandilin.

Hesin hugsanarhátturin, at Føroyar eins og aðrir útjaðarar vóru á einum lægri menningarstigi, enn londini á meginlandinum vóru, hevði fingið alsamt størri rúmd fyrstu áratíggjuni av 19. øld, og á ein hátt ber til at siga, at hesin kolonialistiski hugsanarháttur avloysti veika statin í javnvágsfelluni. Í øllum førum gjørdist hesin hugsanarháttur fremsta grundgeving fyri at bíða við at fremja fleiri av teimum tiltøkum, sum embætismenn vistu vóru neyðug fyri moderniseringina av landinum. Á tann hátt kom javnvágsfellan at verða verandi, sjálvt um statsvaldið í Føroyum ikki longur kundi sigast at vera veikt. Upprunaliga vardi ytri parturin av javnvágsfelluni statin ímóti sínum egna veikleika, men nú varð sama megi nýtt til at verja føroyingar, tí teir vóru ikki nóg siviliseraðir til at taka ímóti nýggju tíðini enn.

Samstundis sum hesin hugsanarháttur helt javnvágsfelluni uppi, var hann eisini grundarlagið undir ætlanunum um, at staturin skuldi standa á odda í strembanini eftir at menna fólkið til at taka við nýggju tíðini. Ein ment fiskivinna var hildin at vera besti mátin at fyrireika føroyingar til frían handil, tí við henni kundi gongd koma á at gera samfelagið meira fjøltáttað, so at tað var betur fyrireikað til at taka kappingina upp, tá ið hon fór at koma. Á tann hátt styrkti hesin hugsanarháttur um tørvin á at menna eina fiskivinnu, og fyrireikingin hevði gjørt mun, tá ið fríhandilin endiliga kom í 1856.

Christian Pløyen gjørdist fjórði amtmaðurin í Føroyum í 1837. Hann hevði longu sum fúti víst, at hann helt fiskivinnuna hava avgerandi týdning sum amboð at menna føroyska samfelagið, og í mun til Tillisch var hann vísur í, at rætti vegurin fram var, at tað almenna átók sær at ganga á odda. Tí var ein av fyrstu ætlanum hansara sum amtmaður at gera eitt uppskot um, hvussu hetta skuldi gerast. Bæði Hunderup sorinskrivari og Lunddahl, sum hevði avloyst Pløyen sum fúti, tóku undir við amtmanninum. Teir vístu kortini báðir á, at Einahandilin gjørdi tað torført at menna nakra nýggja vinnu. Pløyen var upprunaliga ikki heilt samdur við teimum í tí, men so hvørt sum hann sá og merkti, hvussu torført tað var at gera broytingar í handlinum, broyttist støða hansara.

Tá ið Pløyen amtmaður 26. februar 1839 kundi seta undirskrift sína undir eitt uppskot um, hvussu ein fiskivinna kundi mennast í Føroyum, var týðiligt, at hann ikki longur dugdi at síggja nakran serligan fyrimun við Einahandlinum.

Hann mælti tí til, at fiskivinnan slapp at mennast sum ein frí vinna við síðuna av Einahandlinum. Teir, sum fóru undir skiparakstur, skuldu sleppa at keypa útgerð til vinnuna bíligari, og teir skuldu eisini frítt sleppa at selja vørur sínar, har teimum lysti. Á tann hátt kundi ein frælsari vinna mennast undir liðini á Einahandlinum, og við tíðini fór hon at gera, at føroyingar vóru nóg væl fyrireikaðir til at kunna gagnnýta fríhandilin.

Uppskotið hjá Pløyen setti út í kortið, hvussu ein fiskivinna kundi mennast, og hugsanirnar á skriviborðinum gjørdust meira ítøkiligar, tá ið Pløyen saman við trimum føroyingum seinni sama ár fór á eina kanningarferð til Hetlands. Í Hetlandi sást, hvussu nógv ríkari eitt samfelag kundi gerast, har fiskivinnan var ment. Teir fýra fingu bæði reiðskap og kunnleika heim við sær úr Hetlandi, men Pløyen lærdi eisini á ferðini, hvussu lítið frælsi heimurin helt um eina skipan við einahandli. Fyri Pløyen var upplagt at lata hetlendskar vinnulívsmenn seta gongd á eina fiskivinnu í Føroyum, men tað vísti seg at vera eitt stig ov langt, tí í Keypmannahavn var eingin ivi um, at tað bara vóru danskir ríkisborgarar, sum skuldu gagnnýta møguleikarnar, sum lógu í fríum handli og fiskivinnu í Føroyum.

Misnøgd við Einahandilin í 1840 gjørdi, at Handilsstjórnin var undir trýsti at gera tillagingar. Samstundis var marknaðarprísurin á fiski góður, og tí eydnaðist tað í 1841 at fáa Handilsstjórnina at hækka prísin á fiski, sum varð seldur til Einahandilin. Príshækkingin kom júst um sama mundið, sum nógvur fiskur var at fáa inni við land, og menn høvdu hug at royna nýggju tøknina, sum var komin úr Hetlandi. Úrslitið varð, at handilin fekk nógv størri mongdir av turrum fiski, og verður hugt at lutfallinum millum prís og avreiðingarnøgdir, sæst ein týðilig broyting hesi árini, tí prísurin fór at ávirka áhugan fyri at avreiða. Turrur útróðrarfiskur var farin frá at vera ein vøra, sum varð seld, tá ið nakað leyp av, til at verða vinnuligt grundarlag hjá teimum, sum sóu ein fyrimun í hesi vinnuni. Príshækkingin gjørdi við øðrum orðum sítt til, at nøkur fólk brutu karmarnar kring tað gamla støðuga bóndasamfelagið. Hugsandi er, at hesin bólkur seinni eisini fekk týdning, tá ið klippfiskaframleiðslan mentist, tí tey høvdu tørv á fleiri møguleikum og vóru tí til reiðar at taka av, tá ið slíkir møguleikar buðust.

Misnøgdin við Einahandilin elvdi til hugsanir um broytingar og til, at spurningurin um handilin í Føroyum varð lagdur fyri eina nevnd, sum longu í fleiri ár hevði arbeitt við spurninginum um, hvat gerast skuldi við handilin í Grønlandi. Henda nevndin gjørdi upp við fatanina, at føroyingar vóru á einum ov lágum menningarstigi til at kunna fáa fyrimun av fríum handli. Niðurstøðan hjá nevndini var, at grønlendingar enn ikki vóru til reiðar at taka við fríum handli, men í Føroyum var almúgan minst líka mentað, sum danska almúgan var, so har var eingin orsøk til at bíða við at taka Einahandilin av.

So átti at verið leyst og liðugt, tí í nevndini vóru umboð fyri bæði donsk handilsáhugamál, Rentukamarið og Handilsstjórnina umframt tveir embætismenn úr Føroyum, men onkursvegna avgjørdu kongur og Rentukamarið ikki at fylgja tilmælinum hjá nevndini. Kongur hevði bæði frá føroyingum í Keypmannahavn



*Klippfiskavirkingin kring pakkhúsið hjá Jacobæusi helt fram langt inn í 20. øld. Á myndini sæst Háskúlin, sum flutti til Havnar í 1909, høgrumegin, og vinstrumegin sæst Dronning Alexandrine Hospital, sum kom í fyrru helvt av 1920-árunum. (Mynd: Tjóðsavnið 7858F15)*

og krúnprinsinum, sum hevði vitjað í Føroyum, frætt, at føroyingar vóru væl nøgdir við handilin, og tí endaði tað við, at fleiri fyrireikingar skuldu gerast at menna føroyingar til at taka ímóti fríum handli.

Henda avgerðin var ikki sørt afturhaldssinnað, men seinni skuldi tað vísa seg, at ein avleiðing av henni gjørdist, at tað eydnaðist at seta gongd á fiskivinnuna í Føroyum, áðrenn Einahandilin fór í søguna. Í staðin fyri at avtaka Einahandilin avgjørdu kongur og Rentukamarið at seta gongd í nakrar fiskiroyndir í Føroyum árini 1844-46. Endamálið var at vísa, at tað bar til at fiska við skipi undir Føroyum og at lata nakrar føroyingar sleppa at gera sær royndir umborð á fiskiskipi. Rentukamarið metti sjálvt, at hesar royndirnar miseydnaðust, men tað vóru embætismenn í Føroyum als ikki samdir í.

Fiskur fiskaður við skipi skuldi virkast til klippfisk, og tí skipaðu teir, sum stóðu fyri kongligu fiskiroyndunum, eina klippfiskaframleiðslu í Álakeri, sum kundi taka ímóti fiski frá skipunum. Hetta virksemið gav nøkrum havnarfólki arbeiði, men tá ið nú framleiðslan var har, so var upplagt, at klippfiskavirkarin eisini fór at taka ímóti ráfiski frá føroyskum útróðrarbátum. At sleppa av við fiskin og fáa pening í hondina beinanvegin vísti seg at vera ein kærkomin møguleiki hjá útróðrarmonnum, og tann møguleikan vildu teir ikki missa aftur, tá ið kongligu fiskiroyndirnar steðgaðu. Sjálvt um handilsins fólk helst vildu sleppa av við hesa framleiðslu aftur, eydnaðist at forða fyri tí, og tað merkti, at tikið varð móti ráfiski til klippfiskaframleiðslu í Álakeri øll árini frá 1845 og fram.

Embætismenninir í Føroyum hildu, at klippfiskavirkingin var eitt avgerandi vegamót, tí hon hevði prógvað, at tað bar væl til at virka fiskin í Føroyum,

og møguleikin at avreiða ráfisk hevði víst seg at fáa stóra undirtøku millum føroyskar útróðrarmenn. Hesin møguleiki skapti við øðrum orðum umstøður hjá útróðrarfamiljum at vinna til lívsins uppihald uttan fyri bygdarfelagsskapin. Røringur var komin í, gongd var komin í at skapa grundarlag undir einum kapitalistiskum búskapi, og trýst varð lagt á skipanirnar í aldagamla bóndasamfelagnum.

Kongligu fiskiroyndirnar kveiktu áhugan hjá privatpersónum at fara undir at royna seg við fiskiskipi. Sjálvt um almennir myndugleikar í fyrstuni stuðlaðu slíkum ætlanum bæði við láni og serrættindum, miseydnaðust tær flestu royndirnar, og tí kom heldur ikki tann vegin gongd í havgangandi fiskiskap. Royndirnar gjørdu tó í fleiri førum trupulleikan við Einahandlinum ítøkiligan, og serrættindini, sum vóru givin, settu hvør á sín hátt hol í einahandilsmúrin.

Tann privata royndin, sum fekk størstan týdning, var tann hjá A.W. Skibsted, sum var russiskur konsul í Fredrikshavn. Hann fekk hákellingarveiðu at bera til, og tað gav honum grundarlag at royna seg á fleiri øðrum vinnuøkjum. Endin varð, at hansara virksemi var so víðfevnt, at amtmaðurin roknaði hann sum einasta kappingarneytan hjá Einahandlinum. Tá ið Hægstirættur í 1850 staðfesti, at handil við lógliga keyptum vørum millum føroyingar ikki var ólógligur, fekk Skibsted sær fleiri úthandlar. Tað gav nøkrum fólkum møguleikan at liva av at reka handil, og tá ið privat fólk fóru at taka ímóti fiski, var í hvussu er onkur av hesum úthandlunum miðdepil fyri slíkt virksemi, longu áðrenn Einahandilin varð avtikin. Sostatt var virksemið hjá Skibsted við til at fyrireika føroyingar upp á nýggju tíðina.

Meðan roynt varð at kveikja lív í eina føroyska fiskivinnu, kollveltist øll tann politiska skipanin í Danmark, tá ið einaveldið var avloyst av fólkaræði. Henda kollvelting var úrslit av liberala rákinum í Evropa, og tí var einki at siga til, at lítil undirtøka var fyri einari einahandilsskipan millum nýggju politikararnar. Liberala hugsjónin gjørdi, at lítil tiltrúgv var til, at tað bar til at fyrireika føroyingar til avtøkuna av handlinum við at menna nýggjar vinnur, tí vinnuligt frælsi var fortreytin fyri slíkari menning. Úrslitið varð, at áhugin hjá myndugleikunum í Keypmannahavn at menna eina fiskivinnu í Føroyum var lítil, tey árini spurningurin um avtøkuna av Einahandlinum var til viðgerðar í politisku skipanini.

Tí varð tað mest av øllum upp til amtmannin sjálvan at syrgja fyri at menna møguleikarnar í Føroyum og í øðrum lagi at tryggja, at teir møguleikarnir, sum vóru komnir til at avreiða ráfisk og framleiða klippfisk, ikki hvurvu aftur. Pløyen amtmaður fór av landinum í 1848 at taka lut í grundlógararbeiðinum sum kongsvalt umboð fyri Føroyar, og nýggjur amtmaður gjørdist Carl Emil Dahlerup. Hann kom til Føroya á sumri 1849 og fekk beinanvegin stóran áhuga fyri at menna fiskivinnuna. Stutt áðrenn hann kom til Føroya, hevði hann eisini fingið eina nýggja heimild, sum gjørdi, at hann kundi gera nakað við tað, tí tá ið avgerð varð tikin um, at klippfiskavirksemið í Álakeri skuldi halda fram, varð

avgjørt, at amtmaðurin og handilsforvaltarin í felag skuldu taka tær avgerðir, sum takast skuldu hesari framleiðsluni viðvíkjandi.

Tað vísti seg, at tað var ein heppin avgerð, tí meðan amtmaðurin royndi at menna klippfiskaframleiðsluna við m.a. nýggjari ráfiskamóttøku í Klaksvík, vísti tað seg, at bæði handilsforvaltarin og Handilsstjórnin vildu niðurlaga klippfiskavirkingina aftur, tí hon gav handlinum undirskot og gjørdi seg inn á ta ekstraktivu skipanina, sum Einahandilin var so stórur partur av. Stríðið millum partarnar sást aftur í fleiri málum, og endin varð, at gamli handilsforvaltarin var noyddur at siga seg úr starvi. Amtmaðurin vann, og fiskaframleiðslan kundi halda fram og vera við til at leggja lunnar undir eina nýggja tíð.

Virksemið í Álakeri slapp at halda fram saman við tí vinnuliga útróðrinum, sum læt rávøruna til framleiðsluna, og í 1853 sást í tølunum á útfluttum klippfiski, at hetta virksemið endiliga hevði kveikt áhugan hjá privatum at fara undir at framleiða klippfisk, sum so kundi seljast til Einahandilin sum liðug vøra. Í strembanini eftir at menna eina fiskivinnu í Føroyum hevði málið alla tíðina verið at fáa føroyingar at fiska við skipum. Tann ætlanin bar ongantíð ávøkst, men gongd kom á fiskivinnuna kortini, tá ið privatpersónar fóru undir at framleiða ta vøruna, sum fiskivinnan bygdi á. Føroysk fiskivinna mentist við, at tann fiskurin, sum útróðrarbátar landaðu, varð virkaður til klippfisk, og seinni gjørdist júst henda vinnan grundarlagið undir, at føroyingar fóru at fiska við fiskiskipum.

Privata framleiðslan var longu í 1853 á leið líka stór sum tann almenna, og hon vaks við rúkandi ferð. Fleiri og fleiri føroyingar sóu møguleikarnar í tí, sum amtmaðurin hevði stríðst fyri, gongd var komin á menningina av Føroyum sum fiskivinnusamfelag, og so hvørt sum fleiri og fleiri fingu sína inntøku úr hesi nýggju vinnuni, fór at verða torført at steðga gongdini aftur. Broytingin var við at henda, og tað hevði við sær, at trýst var á gamla bygdarfelagsskapinum. Tað sást beinanvegin, tá ið nýggja Løgtingið kom saman á fyrsta sinni. Løgtingið fekk longu í 1852 áheitanir um at steðga nýggja línufiskiskapinum, men í fyrsta umfari valdi tingið ikki at gera meira við málið.

Mótmælini vuksu í tali, so hvørt sum fiskivinnan mentist, og í 1854 endaði tað við, eftir at fleiri áheitanir vóru sendar til Løgtingið við mongum undirskriftum, at Løgtingið samtykti at taka undir við uppskotum um at avmarka nýggju vinnuna. Tingið orðaði eitt lógaruppskot og samtykti at senda tað til Løgmáláráðið. Áðrenn amtmaðurin sendi lógaruppskotið víðari, mælti hann staðiliga frá, at myndugleikarnir gjørdu, sum Løgtingið mælti til, og endin varð, at danska stjórnin tók undir við amtmanninum og valdi at gera ímóti tí, sum fólkavaldu umboðini í Løgtinginum høvdu samtykt.

Hetta var hvørki fólkaræðisliga ella statsrættarliga nøkur heppin avgerð, men hon merkti, at menningin av fiskivinnuni slapp at halda fram. Tað hevði við sær, at tá ið spurningurin aftur varð lagdur fram nøkur fá ár seinni, var Løgtingið ikki longur áhugað í at banna línufiskiskapi. Fiskivinnan var vorðin týdningarmiklasta vinnan í Føroyum, og fríur handil hevði avloyst Einahandilin. Karmarnir um



*Klippfiskapakkhúsið var miðdepilin í fiskavirkingini í Álakeri, sum setti gongd á eina vinnuliga koll-velting í Føroyum. Nógv onnur vinnulig frambrot hendu gjøgnum tíðina í økinum kring pakkhúsið. Í húsinum ytst til høgru vóru motorbátar bygdir stutt eftir aldaskiftið, og tann vinnan mentist til veruligt skipasmíð, sum sæst fremst í myndini. Aftan fyri pakkhúsið eru oljutangar komnir at standa sum ímyndir upp á eina nýggja modernaða tíð. (Mynd: Tjóðsavnið 5101F119)*

gamla bygdarfelagsskapin vóru brostnir, og kapitalistiski búskapurin var komin so væl fyri seg, at tað var meiningsleyst at royna at seta forðingar í vegin fyri honum. Hjá Løgtinginum ráddi nú bara um at gera reglur, so nýggja vinnan varð so mongum at gagni, sum til bar.

Samanlagt ber tí til at siga, at amtmaðurin frá umleið 1825 var avgerandi moderniseringsagenturin í Føroyum, og at hann frá 1832 visti, at fiskivinnan var rætta transformatiónsamboðið at fremja hesa moderniseringina av samfelagnum frá einum statiskum og ekstraktivum bóndasamfelag til eitt inklusivt kapitalistiskt samfelag við stórum menningarmøguleikum. At almenna fyrisitingin fyrra partin av 19. øld var ávirkað av einum stadialistiskum hugsanarhátti, sum gjørdi, at føroyingar vóru mettir at vera á einum lægri menningarstigi enn kongsins undirsáttar á meginlandinum, hevði við sær, at amtmaðurin fekk undirtøku fyri at fremja átøk at fyrireika føroyingar til at taka ímóti modernaðu tíðini.

Henda fyrireiking bygdi eisini í stóran mun á eina menning av fiskivinnuni, og sjálvt um málini í ítøkiligu fyrireikingarátøkunum ikki vóru nádd, so eydnaðist fyrireikingin kortini, tí gongd kom á fiskivinnuna á annan hátt, orsakað av hesum somu tiltøkum. Tá ið føroyingar av álvara tóku nýggju fiskaframleiðsluna til sín í 1853, øktist trýstið á gamla bygdarfelagsskapin, og endin varð, at hann gjøgnum

fólkavaldu umboðini í Løgtinginum fekk samtykt, at nýggja vinnan skuldi steðgast. Amtmaðurin fekk forðað fyri, at afturhaldskenda fólkaræðisliga avgerðin varð gjøgnumførd. Tað gjørdi, at nýggja vinnan áhaldandi slapp at mennast, og fá ár seinni var fiskivinnan vorðin týdningarmiklasta vinnan í Føroyum, og Einahandilin var avtikin. Tí var einki ynski um at avtaka vinnuna aftur, tá ið málið kom fyri Løgtingið aftur í 1860. Tað var greitt tekin um, at fiskivinnan eftir fáum árum hevði koppað samfelagnum so mikið á, at ein modernaður kapitalistiskur búskapur nú var ráðandi, og aldagamli bygdarfelagsskapurin noyddist at finna seg til rættis í nýggju tíðini.

Á henda hátt ber til at siga, at amtmaðurin megnaði at seta gongd á eina fiskivinnu, áðrenn Einahandilin varð tikin av, men tann avgerandi broytingin hendi bara trý ár fyri, at fríhandilin kom. Tí ber til at spyrja, hvussu stóran týdning tað hevði, tá ið saman um kom. Tað var í øllum førum greitt longu frá 1851, at Einahandilin fór at verða avtikin, og tí varð menningin av fiskivinnuni lítið brúkt sum grundgeving fyri at avtaka handilin. Í so máta yvirhálaðu aðrar søguligar hendingar fyrireikingararbeiðið hjá amtmanninum. Eftir stendur kortini, at menningin av privatari fiskaframleiðslu í hvussu er gjørdi skiftið frá Einahandli til fríhandil smidligari, enn um tað var gjørt í einari tíð, har ongin hevði vunnið sær royndir í vinnuligum virksemi ella var farin at hugsa sum borgari í einum modernaðum samfelag.

Í tráð við ástøðið ber til at spyrja, hvussu søguliga gongdin hevði verið, um amtmaðurin ikki var so virkin í moderniseringstráanini, sum hann var. Hevði føroyska samfelagið staðið í stað í einari ekstraktivari skipan, ella hevði gongdin verið á leið tann sama? Svarið upp á tann spurningin kann vera, at gongdin hevði verið nøkulunda tann sama, tí Einahandilin fór at verða avtikin kortini, og so høvdu fríu marknaðarkreftirnar skjótt ment eina vinnuliga fiskivinnu.

So einfalt er svarið kortini neyvan. Tað er ikki vist, at Einahandilin hevði verið avtikin so tíðliga, sum hann varð, um ikki strembanin eftir at menna eina fiskivinnu gjørdi tað púra greitt fyri embætismonnunum í Føroyum, hvussu stórur snávingarsteinur handilin var. Teirra virksemi var við til at gera, at eisini føroyingar gjørdust misnøgdir við handilin viðhvørt, og amtmaðurin var sjálvur virkin í nevndini, sum í 1842 kom fram til, at Einahandilin í Føroyum skuldi avtakast. Henda nevndin avgjørdi, at Einahandilin í Grønlandi skuldi halda fram, og tað sama kundi lættliga verið hent við føroyska handlinum, um amtmaðurin hevði havt ein øðrvísi leiklut, enn hann hevði.

Í øllum førum hevði liberala kollveltingin fá ár seinni onga ávirkan á grønlendska handilin, og í Íslandi fullu bæði javnvágsfellan og Einahandilin longu í 1780-árunum. Í hinum báðum útnorðurlondunum í ríkinum var tað við øðrum orðum ikki grundlógin, sum gjørdi, at Einahandilin varð avtikin, og tí er torført at grundgeva fyri, at avtøkan av Einahandlinum í Føroyum var ein sjálvskrivað avleiðing av grundlógini. Hinvegin var avtøkan av einahandlunum bæði í Íslandi og Grønlandi partur av einari moderniseringstilgongd, sum varð



*Kvinnur og dreingir á fiskastykkinum á Viðarnesi fylgja við havnarbyggingini á Skansatanga. Ein nýggj tíð er á veg, sum klippfiskavirkingin átti sín stóra lut í at gera møguliga. (Mynd: Tjóðsavnið 3350F01717)*

sett í gongd av eksternum ávum. Í Íslandi var tað náttúran, sum av álvara virkaði sum ein konstruktiv niðurbróting, og í Grønlandi var tað amerikanska hersetingin undir krígnum og altjóða avkolonialiseringin, sum gjørdu, at gongd kom í eina modernisering. Sum greitt er frá í hesi ritgerðini, vóru tað serliga amtmenninir, sum í 1820- og 30-árunum fóru undir eina moderniseringstilgongd í Føroyum, og hon var væl á veg, tá ið grundlógin varð samtykt. Avtøkan av Einahandlinum var væl og virðiliga sett út í kortið undir einaveldinum, og hjá fólkaræðinum var bara eftir at gjøgnumføra ætlanina.

Spurnartekin kann eisini setast við, hvussu inkluderandi búskapurin hevði blivið, um Einahandilin var avtikin, uttan at gongd var komin á fiskivinnuna. Dømið úr Hetlandi prógvar, at tað væl ber til hjá einum blómandi fiskivinnubúskapi at fella aftur í eina ekstraktiva skipan, og ein av grundgevingunum fyri at bíða við at avtaka Einahandilin var, at vandi var fyri, at ein avtøka bara fór at merkja, at eitt privat monopol fór at taka yvir, har almenna monopolið slepti. Tað er ikki torført at ímynda sær, at privat handilsáhugamál og ráðandi røddir í bóndasamfelagnum skjótt kundu funnið út av at skipa vinnu og búskap á onkran ekstraktivan hátt,

sum hóvaði báðum pørtum væl, men sum ikki hevði skapt umstøður fyri líka stórari menning.

At amtmaðurin fekk ment fiskivinnuna, áðrenn Einahandilin var avtikin, gjørdi, at fleiri fólk longu fingu ágóðan av nýggjum tíðum, áðrenn fríhandilin kom. Føroyar vóru longu fyri 1856 komnar á eina inklusiva rás, og tað var útgangsstøðið hjá teimum, sum tá fóru at fáast við handilsvirksemi og vinnulív. Tað prógvar, at hypotesan heldur. Amtmaðurin var avgerandi moderniseringsagenturin í Føroyum fyrra partin av 19. øld, og hann tók stig til at menna eina føroyska fiskivinnu og brúkti hana til at byggja upp eitt modernað samfelag við kapitalistiskum búskapi.

# *Summary*

In this thesis, I will explain the governor institution, the *amt*, in the Faroe Islands, as well as the role of the county governor in the modernisation of the country. I argue that the role of the county governor as an agent of modernisation, played a decisive role in the change from the old peasant society to a modern, capitalist society. This perspective challenges nationalistic as well as liberalistic conceptions of history, as it implies that processes of modernisation began already during times of absolutism. Therefore, my argument is in opposition to perspectives which suggest that modernisation emerged as a result of the abolition of absolutism.

The theoretical basis of this thesis is the theory of Acemoglu et.al. (2012) who argue for the importance of inclusive political and economic institutions being at a crossroads in history. The presence of such institutions made it possible to shift society on to a positive path of progression. If extractive institutions were dominant, there was a risk that society could be caught in a vicious circle. In this thesis, the *amt* institution is considered an inclusive institution, whilst the peasant society and the monopoly were extractive.

A modernisation process is made up of several factors. However, the focus of this thesis is to analyse how the county governor attempted to utilise the fishing industry as a tool of transformation. He planned for the fishing industry to become the foundation of a new economy, which could make society more diverse. If the plan was successful, the Faroese would be better prepared to face new times, with the abolition of the monopoly.

In the thesis, I explain how the county governor came to this way of thinking and how he attempted to realise his ideas. I further explain the enormity of the challenge, as Faroese society found itself in an equilibrium trap, and the effect this had on efforts to move society forward. Various efforts to develop a fishing industry are described in detail. I then analyse the objective of these efforts, from where the opposition came, and the results such efforts had on modernisation plans.

Originally, the intention was to develop the fishing industry by encouraging the Faroese to progress to larger vessels in fisheries, but this proved unsuccessul in the middle of the century. However, an unintended consequence of the development of the fishing industry came about through the production of dried salt cod, which was part of the royal fishing trials. These trials commenced in 1844, and when fishermen were provided with the opportunity to sell their catch, it turned out to be the way forward. Once the royal fishing trials were ended, the production of dried salt cod continued. Despite strong resistance to this new industry from the extractive institutions, the county governor, together with a growing number of people who made a living from this new industry, managed to prevent the progress turning into decline.

Opposition against the new industry was reflected in several appeals to the newly founded Faroese parliament, *Løgtingið*, to prevent long-line fishing. At first, it resulted in *Løgtingið* introducing a draft bill to ban the use of the bait which was used for long-line fishing, and this was passed by a large majority. Thus, the new democracy could have put an end to the development of the fishing industry. This did not happen, however, as the county governor asked Danish authorities, on this occassion, to oppose the will of *Løgtingið*, which they did. When the issue of long-line fishing was again brought before *Løgtingið* a few years later, the aim was not to halt the new industry, but merely to improve it through clearer regulations. This was proof that the fishing industry had now seriously consolidated its position.

# *Upprunakeldur*

**Tjóðskjalasavnið**

*Færø Amt*
B-L0001 Copibog 16/6 1806 – 5/6 1809
B-L0006 Copibog Litra J, 18/1 1831 – 8/7 1833
B-L0007 Copibog Litra M, 12/7 1833 – 10/8 1836
B-L0008 Copibog Litra O, 16/6 1835 – 4/5 1838
B-L0009 Copibog Litra R, 4/5 1838 – 19/11 1840
B-L0009 Copibog Litra S, 1/11 1838 – 15/3 1841
B-L0010 Copibog Litra T, 24/11 1840 – 24/1 1844
B-L0010 Copibog Litra U, 25/3 1841 – 18/4 1843
B-L0011 Copibog Litra Y, 24/2 1844 – 12/6 1846
B-L0012 Copibog Litra Ø, 12/6 1846 – 5/10 1850
B-L0012 Copibog Litra AA, 1/6 1847 – 29/1 1850
B-L0013 Copibog Litra BB, 5/10 1850 – 18/6 1852
B-L0013 Copibog Litra CC, 29/1 1850 – 30/7 1851
B-L0013 Copibog Litra DD, 30/7 1851 – 19/4 1853
B-L0014 Copibog Litra EE, 18/6 1852 – 18/12 1853
B-L0014 Copibog Litra GG, 7/12 1853 – 6/9 1855
B-L0015 Copibog Litra KK 6/9 1855 – 10/6 1858
B-L0016 Copibog Litra NN, 10/6 1858 – 30/9 1861
Ba-L0001 Ordrebog No. 1: 9/5 1806 – 16/8 1826
Ba-L0001 Ordrebog No. 2: 27/4 1805 – 9/2 1828
C-L0006 Journal Litra L, 27/4 1838 – 20/4 1840
Eb-L0035-38 Indkomne Breve, Litra G
Eb-L0043 Indkomne Breve, Litra J
b-Eb-L0043-45 Indkomne Breve, Litra K
Eb-L0045-50 Indkomne Breve, Litra L
Eb-L0051-54 Indkomne Breve, Litra M
Eb-L0062-64 Indkomne Breve, Litra P
Eb-L0064-67 Indkomne Breve, Litra Q
Eb-L0068-71 Indkomne Breve, Litra R
Eb-L0072-76 Indkomne Breve, Litra S
Eb-L0077-84 Indkomne Breve, Litra T
Eb-L0085-90 Indkomne Breve, Litra U
Eb-L0091-94 Indkomne Breve, Litra V
Eb-L0095-99 Indkomne Breve, Litra X

*Stiftamtmaðurin A-1037*
Bb-L002 Stiftamtmandsskrivelser 1780 – 1806 (ca.)
Ca-L0001 Protokol for Færø nr. 1 – 1720 6. marts – 1721 10. juni
Ca-L0003 Protokol for Færø nr. 3 – 1723 9. august – 1725 1. august
E-L0003 Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1722-25

*Fútin (Politimeistarin)*
B-L001 Kopibog 12/09-1707, 24/05-1729
B-L003 Kopibog 17/02 1830 – 24/12-1837
B-L003 Kopibog 01/01 1838 – 13/08 1841
Da-L0001 Inngangandi brøv og journalmál 1716-1730
Da-L0012 Inngangandi brøv og journalmál 1836-40

*Sorinskrivarin (Dómarin í Føroyum)*
B-L0001 Kopibog 1833-1839

*Løgtingið*
Færøernes Lagthings Forhandlings-Protokol I. Begyndt d. 29. Juli 1852 og Endt d. 22. August 1855
Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol Begyndt 22de August 1855 Endt 13de August 1861
Færøernes Lagthings Forhandlings Protocol III Begyndt 16de August 1861 Endt den 31 Juli 1868
Lagtingssager, 1852-73
Lagtingssager, 1856-1858
Lagtingssager, 1859-1860
Lagtingssager, 1863-1864
Forskellige Lagtingssager 1852-56

*Eysturoyar Sýsla*
B-L0001 Kopibøkur 1836-1853
Fa-L0001 Politiprotokollir 1816-1868

*Savnið hjá John F. West*
Grindabókin

*Savnið hjá Anton Degn*
Avrit av áliti hjá Lunddahl fúta dagfest 7. oktober 1846.

**Ríkisskjalasavnið**

*Danske Cancelli*
Diverse dokumenter og regnskaber ang. Færøerne, Island og Grønland (1640-1798)

*Rentukamarið*
Diverse breve og dokumenter vedr. Færøerne og den færøske handel (1682-1847)
Afskrifter af eller koncepter til forestillinger vedr. Færøerne og Grønland (1773-1848)

*Den Administrerende Direktion for den Kgl. Færøske Handel (Den færøske handelskommission)*
Hovedbøger. Strømø 1830-1836.

*Kongehuset*
Frederik 7., konge, sager vedr. Færøerne 1844-45

*Indenrigsministeriet*
Kommissionen af 21. September 1853 til overvejelse af sagen om udvidet handelsfrihed for Island (Den til overvejelse af den islandske og færøske handelssag nedsatte kommission (1853-1854). Forhandlingsprotokol

**Landsbókasavnið**

*Handritagoymslan:*
Viðmerkingar Borns til frágreiðingina „Indberetninger frá ein Reise i Færøe 1781 og 1782" hjá Jens Christian Svabo (E 641)

**Fróðskaparsetur Føroya**

*Bandasavnið á Føroyamálsdeildini*
Fyrilestrar hjá Joen Davidsen um Nólsoyar Páll

**Dagbløð**
Berlingske politiske og Avertissements-Tidende nr. 316 og 328, 1844.
Berlingske Tidende nr. 199, 1850
Dagen nr. 231, 1840
Fædrelandet nr. 549, 1841
Fædrelandet nr. 605, 1841
Kiøbenhavns Kongelig alene priviligerede Adresse-Comptoirs Efterretninger nr. 251, 1841
Kjøbenhavns kongelig alene privilegerede Adressecoptoirs Efterretninger. Nr. 36, 1844.
Kjøbenhavnsposten nr. 285, 1841
Aalborgs Stiftstidende og Adresse-Avis nr. 15, 1845

**Ymiskt**
Dansk Biografisk leksikon
Norske Rigsregistranter IV
Forordning om en nye Interims Indretning med Handelen paa Færøerne for 5 Aar, Frederiksberg Slot den 13de August 1790
www.jmarcussen.dk
www.history.fo

# *Bókmentir*


Acemoglu, Daron og Robinson, James A. (2012) *Why nations fail, the origins of power, prosperity, and poverty*. 1. útg. New York: Crown Business

Albrechtsen, Esben, Frandsen, Karl-Erik, og Lind, Gunner (2001) *Dansk udenrigspolitiks historie Bind 1, Konger og krige, 700-1648*. Keypmannahavn: Danmarks Nationalleksikon

Andersen, N. (1964) *Færøerne 1600-1709*. Tórshavn: Helge Justinussen

Bjørk, E.A. (1956) *Færøsk bygderet*. Tórshavn: Matrikulstovan

Bloch, J. (1895) *Stiftamtmænd og Amtmænd i Kongeriget Danmark og Island 1660-1848*. Keypmannahavn: Rigsarkivet i kommission hos C.A. Reitzel

Boje, Per (2014) *Vejen til velstand - marked, stat og utopi, om dansk kapitalismes mange former gennem 300 år*. Odense: Syddansk Universitetsforlag

Brimnes, Niels (1992) „Dansk kolonihistorie mellem historievidenskab og antropologi - et forslag til metode". *Jyske Historiker* 60, 101–118

Busck, Steen (2011) *Et landbosamfund i opbrud, tradition og modernisering i Sundby sogn på Mors i tiden 1660-1800*. Århus: Klim

Chakrabarty, Dipesh (2008) *Provincializing Europe, Postcolonial Thought and Historical Difference*. Reissue, w. Princeton: Princeton University Press

Christian, VIII (1995a) *Kong Christian VIII.s dagbøger og optegnelser IV 2. del 1844-1848*. ritstj. Monrad Møller, Anders. Keypmannahavn: Det kongelige danske Selskab for Fædrelandets Historie

Christian, VIII (1995b) *Kong Christian VIII.s dagbøger og optegnelser IV 1. del 1839-1843*. ritstj. Monrad Møller, Anders. Keypmannahavn: Det kongelige danske Selskab for Fædrelandets Historie

Christiansen, Ólavur (1998) *Villinistíggir upplýstir - tær til verju - á markaskilinum millum heimastýri og fullveldi og millum ørmundarhús og valahús / Ólavur Christiansen*. Tórshavn: Føroyaklettur

*Dansk biografisk Lexikon, tillige omfattende Norge for Tidsrummet 1537-1814, bind VI* (1887) Kbh

Davidsen, Joen (1983) „Pól á Lað og einahandilin". *Varðin* 50 (3–4), 261–267

Debes, Hans Jacob (2000) *Føroya søga 3. Frá kongaligum einahandli til embætisveldi*. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur

Debes, Hans Jacob (1995) *Føroya søga 2, skattland og len*. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur

Debes, Hans Jacob (1990) *Føroya søga, 1, Norðurlond og Føroyar*. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur

Debes, Hans Jacob (1982) *Nú er tann stundin ... tjóðskaparrørsla og sjálvstýrispolitikkur til 1906 - við søguligum baksýni*. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur

Debes, Hans Jacobsøn (1769) *Kort Underretning om Indbyggernes Handels-Maade paa Færøe samt Forsøg til Handelens muelige Forbedring samme Steds*. Keypmannahavn

Debes, Hans Jacobsøn (1763) *Sandfærdig og tydelig Beskrivelse Om Ager=Dyrkningen Og Korn=Avlingen Paa Fær=øerne til billig Eftertanke fremlagt af en Patriot*. Keypmannahavn: Trykt hos Directeuren over hans Kongelige Majestæts og Universitets Bogtrykkerie Nicolaus Christian Høpffner

Debes, Lucas (1963) *Færøernes Beskrivelse*. Keypmannahavn: Munksgaard

Degn, Anton (1934) *Kommissionsbetænkningen 1709-10 ang. Færøernes Tilstand ved Kongens Overtagelse af Enehandelen paa Færøerne*. Tórshavn: Færø Amtstidendes Bogtrykkeri

Degn, Anton (1929) *Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen paa Færøerne 1709-1856*. Tórshavn: Varðin

Djupedal, Reidar (1957) *Jens Christian Svabo : Eitt tillag til lívssøgu hansara, [1]-(2)*. Tórshavn: Varðin 33

Eggertsson, Thráinn (1996) „No experiments, monumental disasters: Why it took a thousand years to develop a specialized fishing industry in Iceland". *Journal of Economic Behavior & Organization* [online] 30 (1), 1–23

Engelhardt, Juliane (2006) „Borgerskab og fællesskab. De patriotiske selskaber i den danske helstat 1769-1814". *Historisk Tidsskrift* 106 (1), 33–63

Evensen, A.C. (1908) *Savn til Føroyinga sögu í 16. öld*. Tórshavn: Hitt føroyska bókmentafelagið

Flo, Yngve (2014) *Statens mann, fylkets mann : norsk amtmanns- og fylkesmannshistorie 1814-2014*. Bergen: Fagbokforlaget

Friðriksson, Guðjón og Þór, Jón Þ. (2013) *Kaupmannahöfn sem höfuðborg Íslands*. Reykjavík: Hið íslenska bókmenntafélag

Friisberg, Claus (2017) *Grænser for magt, Frederik 3. og enevældens indførelse*. Varde: Vestjysk Kulturforlag

Frisk Jensen, Mette (2013) *Korruption og embedsetik, danske embedsmænds korruption i perioden 1800 til 1866*. Odense: Syddansk Universitetsforlag

Gad, Finn (1984) *Grønland*. Keypmannahavn: Politiken

Gamrath, Helge (1980) *Københavns historie Bd. 2, 1600-1728, residens- og hovedstad.*

Garde, C.B. (1970) „Et Par Ord om den kongelige færøeske Handels Bestyrelse". Í *Carl Mogensens Færøeske Krønike*. Tórshavn: Einars Prent og Forlag

Goodlad, C.A. (1971) *Shetland fishing saga*. ed. by Goodlad, C.A. Lerwick: Shetland Times

Goodlad, John H. (2014) *The Shetland cod fishery from 1811 to 1909*. University of Aberdeen

Gunnarsson, Gísli (1983) *Monopoly trade and economic stagnation, studies in the foreign trade of Iceland 1602-1787*. Lund: Ekonomisk-Historiska Föreningen i Lund

Gustafsson, Harald (1985) *Mellan kung och allmoge, ämbetsmän, beslutsprocess och inflytande på 1700-talets Island*. Stockholm: Almqvist & Wiksell

Guttesen (edit.), Rolf (2010) *Strømøe Syssels Forfatning. Indberetninger fra Sysselmanden i Henhold til Amtsordre af 23. November 1830, ver. 4.1 . Internet*. www.history.fo

Guttesen, Rolf (2017a) „Allir føroyingar vóru ímóti fríhandli". *Frøði* 2, 34–37

Guttesen, Rolf (2017b) „Gátan um sýnsbrævið hjá 'Royndini Fríðu'". *Frøði* 1, 18–23

Guttesen, Rolf (2016) „Regionalar variatiónir í kornveltingini fyrr í tíðini". *Fróðskaparrit* 63, 103–116

Guttesen, Rolf (2014) „Fisketiendesagen. Nye produktionsformer giver problemer for gamle beskatningsmåder". *Fróðskaparrit* 61, 5–19

Guttesen, Rolf (2010) „Veðurlag, framleiðsla og fólkatal í 1800-talinum og fyrr". Í *Brot úr Føroya Søgu.*

Guttesen, Rolf (2004) „Food production, climate and population in the Faeroe Islands 1584–1652". *Geografisk Tidsskrift-Danish Journal of Geography* 104 (2), 35–46

Hansen, J. Símun (1981) *Tey byggja land 7. partur: Klaksvíks sókn seinna helvt*. Klaksvík

Heiberg, Edv. O., Petersen, Siegw, Lange, Christian C.A., Lundh, Otto Gr, Sars, I.E., Øverland, O.A., Nielsen, Yngvar, og Thomle, E.A. (1861) *Norske Rigs-Registranter tildeels i Uddrag*. Christiania

Høgnesen, Rólant Waag (1968) *Færøernes stilling i det dansk-norske rige indtil 1855. Med særligt henblik på de institutionelle ændringer omkring 1800*. Københavns Universitet

Isholm, Erling (2018) „Økonomiske og politiske forklaringer på Islands og Færøernes forskellige veje til selvstændighed." Fyrilestur á seminarinum *Málting um íslendskt fullveldi - søga, samanburðir og orðaskifti.* Aðalkonsulát Íslands og Fróðskaparsetur Føroya, Kongshøll 11. oktober 2018, Tórshavn

Isholm, Erling (2016) „Grind - ein vinnugrein". Fyrilestur á ráðstevnuni *Frændafundur 9*. Háskóli Íslands 26.-28. august 2016, Reykjavík

Isholm, Erling (2014) „Tá ið amtmaðurin fór at keypa epli". *Fróðskaparrit* 61, 52–83

Jacobsen, Helgi (2007) *Hvalurin er mín : søgan um stórhvalaveiðuna í Føroyum*. Tórshavn: Tórshavn: Ritstarv

Jakobsen, Jakob (1891) „Poul Nolsø. Et Livs- og Tidsbillede fra Færøerne ved Slutningen af det 18de og Begyndelsen af det 19de Aarhundrede“. *Historisk tidsskirft* 6 (3), 517–601

Jespersen, Leon og Knudsen, Tim (2000) *Dansk forvaltningshistorie, stat, forvaltning og samfund.* 1. útg. Keypmannahavn: Jurist- og Økonomforbundet

Joensen, Einar (1961) *Løgtingsbókin 1666-77.* Tórshavn: Forlag Einars

Joensen, Einar (1958) *Løgtings- og Vártingsbókín 1655-66.* Tórshavn: Forlag Einars

Joensen, Einar (1953) *Tingbókin, 1615-54.* 2. útg. Tórshavn: Einar Joensen

Joensen, Hans Andreas (1981) *Enehandelen på Færøerne 1777-1807.* Keypmannahavn

Joensen, Jóan Pauli (1991) „Handel på Færøerne: En sej historie“. *Nordatlantiske foredrag, seminar om nordatlantisk kulturforskning i Nordens Hus på Færøerne 27.-30. august 1990* 15, 74–81

Joensen, Jóan Pauli (1985) *Folk og fisk, en studie over produktion og miljø i klipfiskeberedningen på Færøerne.* Aalborg: Aalborg Universitetsforlag

Joensen, Jóan Pauli (1982) *Fiskafólk. Ein lýsing av føroyska húshaldinum í slupptíðini.* Tórshavn: Annales Societatis Scientiarum Færoensis Supplementum VIII. Føroya Sparikassi

Joensen, Jóan Pauli (1975) *Færøske sluppfiskere. Etnologisk undersøgelse af en erhvervsgruppes liv.* Tórshavn: Annales Societatis Scientiarum Færoensis Supplementum VI. Føroya Fróðskaparfelag.

Joensen, Johan K. (1955) „Peningaviðurskifti Bankar og sparikassar“. i *Føroyar undir fríum handli í 100 ár. Minnisrit um frígeving Føroya handils 1. januar 1856.* Tórshavn: Føroya Landsstýri Føroysk Handilsfeløg, 161–188

Joensen, Johan K., Mortensen, Arnbjørn, og Petersen, Poul (1955) *Føroyar undir fríum handli i100 ár, minnisrit um frígeving Føroya handils 1. januar 1856.* Ritstj. Joensen, Johan K., Mortensen, Arnbjørn, og Petersen, Poul. Tórshavn: Føroya Landsstýri Føroysk Handilsfeløg

Joensen, Robert (1946) *Útróður 1845-1945, meginparturin viðvíkjandi útróðrinum frá Klakksvík.* Klakksvík: Egið forlag

Johansen, Sámal Tróndur Finnsson (1997) *Fra „hose“ til fiskefilet!, en studie i Færøernes teknoøkonomiske historie.* Roskilde: Roskilde Universitetscenter, Institut for Geografi og Internationale Udviklingsstudier

Jørgensen, Harald (1964) *Statsrådets forhandlinger 1848-1863, bind 6, 7. juni 1854 - 30. august 1856.* Ritstj. Jørgensen, Harald. Keypmannahavn: Rigsarkivet

Jørgensen, Harald (1960) *Statsrådets forhandlinger 1848-1863, bind 4, 28. januar 1852 - 19. april 1853.* Ritstj. Jørgensen, Harald. Keypmannahavn: Rigsarkivet

Jørgensen, Harald (1958) *Statsrådets forhandlinger 1848-1863, bind 3, 3. september 1850 - 28. januar 1852.* Ritstj. Jørgensen, Harald. Keypmannahavn: Rigsarkivet

Karpantschof, René og Mikkelsen, Flemming (2013) „Petitioner, adresser og demokrati i Danmark 1835-1899“. *Temp-Tidsskrift for historie* 7, 50–78

Korsgaard, Peter (1982) „»Beaucoup de bruit pour une aumelette : (Skerjingin í rættinum at ganga í hjúnalag í Føroyum eftir fyriskipanini frá 21.5.1777)“. *Fróðskaparrit* 30, 59–70

Korsgaard, Peter (1979) „Fyriskipanin frá 3.5.1723 um handil í Føroyum“. *Fróðskaparrit* 27. bind, 113–129

Langkilde, Charlotte (2018) *Færøerne, en moderne nation fødes.* 1. útg. Keypmannahavn: Lindhardt og Ringhof

Laursen, L. og Christiansen, Carl S. (1907) *Danmark-Norges Traktater 1523-1750 med dertil hörende Aktstykker, Traités du Danemark et de la Norvège.* Keypmannahavn: paa Carlsbergfondets Bekostning

Lind, Gunner (2000) „Den heroiske tid? Administrationen under den tidlige enevælde 1660-1720“. i *Dansk forvaltningshistorie, stat, forvaltning og samfund.* 1. útg. Keypmannahavn: Jurist- og Økonomforbundet

Lund, U.A. (1770) *Anmerkninger over Hr. Laugmand Hans Debes Afhandling om den Færøeske Handels Forbedring. [Dat. Thorshavn d. 80. Dec. 1769.].* Keypmannahavn

Marnersdóttir, Malan og Sigurðardóttir, Turið (2011) *Føroysk bókmentasøga 1.* Tórshavn: Nám

Mentamálaráðið (2012) *Føroyskt bátasmíð. Álit um at skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi*. Tórshavn
Mortensen, Andras (2003) „Økonomisk udvikling på Færøerne i senmiddelalderen“. Í *De vestnordiske landes fælleshistorie: udvalg af indledende betragtninger over dele af den vestnordiske fælleshistorie*. Nuuk: Direktoratet for Kultur, Uddannelse, Forskning og Kirke, 94–109
Mortensen, Arnbjørn (1955) „Yvirlit yvir søgu einahandilsins“. Í *Føroyar undir fríum handli í 100 ár. Minnisrit um frígeving Føroya handils 1. januar 1856.* ed. by Joensen, Johan K., Mortensen, Arnbjørn, og Petersen, Poul. Tórshavn: Føroya Landsstýri Føroysk Handilsfeløg, 7–76
Muhle, Carl Adolf (1970a) *Carl Mogensens færøeske krønike, Skriv og blaðgreinir um kongaliga handilin um somu tíð eru skoytt uppí*. Tórshavn: Einars prent og forlag
Muhle, Carl Adolf (1970b) *Om emancipationen af Færøerne og Grønland*. Tórshavn: Einars Prent og Forlag
Nicolson, James R. (1982) *Hay & Company: Merchants in Shetland*. Lerwich: Hay & Co
Nielsen, Peter Korsgaard (1976) *Den kongelige enehandel på Færøerne 1709-1776*. Keypmannahavn
Nolsøe, J. (1841) *Beretning om den Kongelige færøiske Handels Organisation, og dens Bestyrelse på Færøerne; foranlediget ved Provst C. B. Gardes Skrift, betitlet: „Et Par Ord om den Kongelige færøiske Handels Bestyrelse“*. Keypmannahavn
Nolsøe og Jespersen, Kári (2009) *Havnar Søga 3*. Tórshavn: Tórshavnar kommuna
Nolsøe og Jespersen, Kári (2009) *Havnar søga 5*. Tórshavn: Tórshavnar kommuna
Nolsøe og Jespersen, Kári (2004a) *Havnar Søga 1*. Tórshavn: Tórshavnar kommuna
Nolsøe og Jespersen, Kári (2004b) *Havnar søga 2*. Tórshavn: Tórshavnar kommuna
Nolsøe, Lena (2010) *Brot úr Føroya søgu*. Tórshavn: Fróðskapur
Nolsøe, Páll J. (1984) *Føroya Siglingarsøga 1. 1000-1856*. Tórshavn: Egið forlag
Olsen, Olaf og Bjørn, Claus (1990) *Gyldendal og Politikens Danmarkshistorie, Bind 10, Fra reaktion til grundlov, 1800-1850*. Keypmannahavn: Gyldendal og Politiken.
Olsen, Olaf og Feldbæk, Ole (1990) *Gyldendal og Politikens Danmarkshistorie, Bind 9 , Den lange fred, 1700-1800*. Keypmannahavn: Gyldendal og Politiken.
Olsen, Olaf og Scocozza, Benito (2003) *Gyldendal og Politikens Danmarkshistorie, Bind 8, Ved afgrundens rand: 1600-1700*. 2. útg.,. Keypmann: Gyldendal og Politiken
Olsen, Olaf og Wittendorff, Alex (2003) *Gyldendal og Politikens Danmarkshistorie, Bind 7, På Guds og Herskabs nåde, 1500-1600*. 2. útg. Keypmannahavn: Gyldendal og Politiken.
Olsen, Óli (2016) *Nólsoyar Páll - siglingarmaður og skald*. Argir: Kjølur
Patursson, Erlendur (1961a) *Fiskiveiði – Fiskimenn 1850-1939. 1. bind. Minningarrit Føroya Fiskimannafelags 1911-1961*. Tórshavn
Patursson, Erlendur (1961b) *Fiskiveiði – Fiskimenn 1850-1939. 2. bind. Minningarrit Føroya Fiskimannafelags 1911-1961*. Tórshavn
Pedersen, Karl Peder (2007) „De første norske amtmænd: om baggrunden for amtmandsinstruksen af 1685“. *Heimen* 44, 3–16
Pedersen, Karl Peder (1998) *Enevældens amtmænd - Danske amtmænds rolle og funktion i enevældens forvaltning 1660-1848*. Keypmannahavn: Jurist- Økonomforbundets Forlag
Pers, Henrik (1972) „Christian 4.s merkantilistiske erhvervspolitik“. *Historie* 10, 391–414
Petersen, Poul (1968) *Ein føroysk bygd*. Tórshavn: Egið forlag
Petersen, Poul (1955) „Undir fríum handli“. Í *Føroya undir fríum handli í 100 ár. Minnisrit um frígeving Føroya handils 1. januar 1856.* ed. by Joensen, Johan K., Mortensen, Arnbjørn, og Petersen, Poul. Tórshavn: Føroya Landsstýri Føroysk Handilsfeløg, 77–160
Pløyen, Christian (1966) *Erindringer fra en Reise til Shetlandsøerne, Ørkenøerne og Skotland i Sommeren 1839*. Tórshavn: Einars Forlag
Rigsdagen (1853) „Beretning om Forhandlingerne paa Rigsdagen“. *Beretning om Forhandlingerne paa Rigsdagen*
Rigsdagen (1848) *Beretning om Forhandlingerne paa Rigsdagen*. Keypmannahavn: Rigsdagen
„Rigsdagstidende“ (1854a) *Rigsdagstidende Landstinget*

„Rigsdagstidende“ (1854b) *Rigsdagstidende Folketinget*
„Rigsdagstidende“ (1851) *Rigsdagstidende Folketinget 1850-51*
Róbertsdóttir, Hrefna (2008) *Wool and society, manufacturing policy, economic thought and local production in 18th-century Iceland*. Göteborg: Makadam
Rye, D.H. (1866) *Betænkning om Fiskeriforholdene paa Færøerne, afgiven til Justitsministeriet*. Keypmannahavn: J. H. Schultz
Schrøter, J.H. (1836) *Samling af kongl. Anordninger og andre Documenter, Færøerne vedkommende, tilligemed en Afhandling* [online] Keypmannahavn: S.L. Møller
Simonsen, Kim (2015) „The romantic canon and the making of a cultural saint in the Faroe Islands“. *Romantik: Journal for the Study of Romanticisms* 3 (1), 73–92
Simonsen, Kim (2012) *Literature, imagining and memory in the formation of a nation, travel writing, canonisation and the formation of a national self-image in the Faroe Islands*. Roskilde: Department of Culture and Identity, Roskilde University
Smith, Brian (2011) „Hákon Magnusson's root-and-branch reform of public institutions in Shetland, c. 1300“. Í *Taxes, tributes and tributary lands in the making of the Scandinavian kongdoms in the Middle Ages*. ed. by Imsen, Steinar. Trondheim: Tapir academic press, 103–113
Smith, Richard John (1986) *Shetland in the world economy : a sociological history of the 18th and 19th centuries*. Edinburgh
Stænderforsamling Roskilde (1846) *Tidende for Forhandlingerne ved Provindsialstænderne for Sjællands, Fyens og Lollands-Falsters Stifter samt for Færøerne i 1846*. Keypmannahavn, Roskilde
Stænderforsamling Roskilde (1844) *Tidende for forhandlingerne ved Provindsialstaenderne for Sjaellands, Fyens of Lollands-Falsters stifter samt for Island Faerøerne*. Kjøbenhavn: Brøderne Berling
Stænderforsamling Slesvig (1838) *Tidende for forhandlingerne ved Provindsialstaenderne for hertugdömmet Slesvig [med Bilags-hefte]*. Slesvig: Trykt og forlagt i det Kongelige døvstumme-institut
Stænderforsamling Slesvig (1836) *Tidende for Forhandlingerne ved Provindsialstænderne for Hertugdømmet Slesvig 1836*. Slesvig
Steining, Jørgen (1958) „Nyere historie“. Í *Færøerne, 1-2*. Ritstj. Djurhuus, Napoleon og Jacobsen, Ole. Keypmannahavn: Dansk-færøsk Samfund, 195–260
Steining, Jørgen (1949) „Rigsdagen og Færøerne“. Í *Den danske rigsdag, 1849-1949, bind 6*. Ritstj. Frisch, Hartvig, Bomholt, Jul, Statsministeriet, og Præsidiet, Rigsdagen. København: J. H. Schultz, 105–201
Stoklund, Bjarne (1991) „Fra center til periferi“. Í *Nordatlantiske foredrag, seminar om nordatlantisk kulturforskning i Nordens Hus på Færøerne, 27.-30. august 1990*. Ritstj. Joensen, Jóan Pauli, Johansen, Ruth, og Kløvstad, Jan. Tórshavn: Norðurlandahúsið i Føroyum
Svabo, Jens Christian (1976) *Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782*. Keypmannahavn: C.A. Reitzel.
Svabo, Jens Christian (1937) „Tanker om Færøes Ekonomie og dens Forbedring“. *Varðin* 17, 211–236
Svabo, Jens Christian (1773) *Kort ekonomisk Underretning om Kiødsaltning, Sviin, Kartofler og Haver. Uddragen af andre til den Færøske Landmands Nytte, Hf.1*. Keypmannahavn: Brødrene Berling
Sølvará, Hans Andrias (2017) „De britiske engle - rigsfællesskabet mellem dansk afmagt og britisk storpolitik“. *Temp - tidsskrift for historie* [online] 7 (13 SE-Debat og anmeldelser), 212–234
Sølvará, Hans Andrias (2016) *The Rise of Faroese Separatism, Danish-Farose relations from 1906-1925 and the radicalization of the national- and home rule questions*. Tórshavn: Fróðskapur
Sølvará, Hans Andrias (2008) *Klaksvíkar søga, 1. bind. Frá búseting til fríhandil, 1000 til 1856*. Vestmanna: Sprotin
Sølvará, Hans Andrias (2002) *Løgtingið 150. Hátíðarrit. 150 ár liðin, síðani Løgtingið varð endurstovnað. 1. bind.* Tórshavn: Føroya Løgting
Thorsteinson (1822) „Om den Færøske Handels Tilstand i ældre og nyere Tider, samt om denne Handels Frigivelse“. Í *For Historie og Statistik især Fædrelandets*. Ritstj. Collin, J. Keypmannahavn: Hartvig Friedrich Popp, 39–92

Thorsteinsson, Jákup (1990) *Et Færø som Færø : studier i Færøernes forfatningsmæssige stilling i forhold til Danmark 1834-1852*. Aarhus: (North Atlantic monographs 2) SNAI - North Atlantic Publications Aarhus UP.

*Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission, nedsat i Henhold til Lov af 13/3 1908* (1911) Kbh

Topsøe-Jensen, T.A. og Marquard, Emil (1935) *Officerer i den dansk-norske Søetat 1660-1814 og den danske Søetat 1814-1932*. Keypmannahavn: H. Hagerups Forlag.

Wang, Zakarias (2008) *Eikirøtur 1832-2007*. Tórshavn: Eik grunnurin.

West, John F. (1985) *The History of the Faroe Islands 1709-1816*. Keypmannahavn: C.A. Reitzel.

West, John F. (1975) *The Changing Character of Faroese Communal Land Tenure During the Nineteenth Century*. Nottingham Trent Polytechnic.

West, John F. (1972) *Faroe, the emergence of a nation*. London: Hurst.

Wylie, Jonathan (1987) *The Faroe Islands: interpretations of history*. Lexington, Kentucky: University Press of Kentucky.

Zachariassen, Louis (1961) *Føroyar sum rættarsamfelag 1535-1655*. Tórshavn: Annales Societatis Scientiarum Færoensis Supplementum IV. Føroya Fróðskaparfelag.

# *Navnayvirlit*


Absalonsen, Guttorm 474, 566
Acemoglu, Daron 43-48, *45*, 146, 593, 594
Achutegui, Francesco de 381
Afrika 262
Aggerhus 76
Alberti, Carl Christian 456, *456*
Alberti, P.A. *456*
Albertsen, Ole 511
Aldershvile 348
Alert 228
Algreen-Ussing, Tage *264*, 265
Altona 186, 187, 189, 382, 427
Amager 68, 478
Amalienborg *305*
Amerika 148, 430
Amsterdam 69, 70, 126
Andersen, N. 25, 79, 121, 122, 126, 135
Anderson, Arthur 229, *229*, 230, 298
Andreasen, Andreas 527
Andreasen, Joen 532
Andreasen, Poul *427*
Andreasen, skipari 509
Anthoniussen, Joen 369
Anthoniussen, Zacharias 518, 519, 520
Arcturus 585
Asia 69
Augustinussen, Simon 97

Álaker 362, 369, 372-374, *374*, 379, 385, 387, *387*, *467*, 489, *491*, 493, *494*, 495-497, 504, 515, 519, 525, 526, 533, 535-542, 545, 547, 548, 552, 554, *563*, *572*, 599-601, *602*
Álakersbøur 411, 412, *538*

Bang, Andreas 90, 144, 145
Bang, Peter Georg 446, *447*, 448, 451, 466, 468, *475*, 485, 487
Barbara 290, 291
Barcelona 228
Bardenfleth, Carl Emil 483, *483*, 484
Barfod, Frederik 455, 476
Baugh, capt. 206
Begtrup, Joachim 96
Benedictsen, J.J. 354
Bentzen 474, 481
Berg, sersjantur 426, *426*
Bergen 89, 97, 115, 117, 118, 203, 209, 221
Berintsson, Jóhannes 129
Berlin 74
Bessastaðir 75, 89, 594, 595
Bielke, Henrik 67, 75
Bilbao 381, 382
Bille, Steen Andersen 349, 468
Biskupsstøð 507
Bjørk, E.A. 53
Bjørn konsul 282
Blacksness *293*
Blekinge 68
Bluhme, C.A. 466
Blücher kamarharri 351
Bohus 70
Boje, Per 35, 171
Bondesen, Peter 182
Born, Christian Ludvig von 56, 150, 162-164, *162*, 188, 189, 193-197, *194*, *195*, 219, 221, 224, 383, *384*
Bornholm 92-95, 97, 101, 484, *485*
Bouelsø 74
Breckling, Herman 129
Bretland 170, 180, 188, 231, 343
Brimnes, Niels 40, 41
Brockenhuus, Henrik Adam 90, 91, *91*
Brüssel 382
Burra 293, *295*, 296
Busck, Steen 52-55, *53*
Bülow, Kristoffer Schøller 91, 100-104, *102*
Bærentsen, Enok D. 579-581
Bærentsen, Jacob 96

Carl X Gustav 68, *69*, 70
Caroline 214, 215
Cathrine 290, 291
Chakrabarty, Dipesh 22, 172, 449
Charisius, Jonas 118, 119, *120*, 124
Charlottenlund 349
Christensen, Balthazar 479, 480
Christensen, M.N. 365, 367
Christiania 120
Christianopel 120
Christiansborg 109, *348*, *453*
Christiansen, D.P. 474, 571
Christiansen, Joen 96
Christiansen, Mads 125
Christiansen, Rasmus *119*
Christiansstad 120
Christie, Robert 290
Chritianshavn 120, *344*
Cicero 154
Clausen, Hans Arreboe 355, *356*, 358, 360-363, 372, 373, 375, 377-380, *379*, 382
Clio 206
Coeworden *128*
Collin, Jonas 268, 335, *336*
Contet, W. 174
Curlew 290

Dahl, Jákup *107*
Dahlerup, Carl Emil 33, 34, *34*, 412, 416, 417, 424, 425, 440, *454*, 462-464, *464*, 466, 496-498, *499*, 500, 503, 505, 506, *507*, 508, 513-520, *515*, 523, *524*, 525, *525*, 534, 536, 537, 541, 542, 544, 552, 553, 555, 567, *572*, 578, 585-587, *587*, 600
Dalur 247
Danielsen, Dánjal *315*
Danielsen, Hans 131
Danielsen, Joen 571
Danielsen, Mikkjal 580
Danmark 32, 41, 64, 66-68, 70, 72, 74, 80, 82, 84, 90-94, 98, 102, 105-109, 113, 117, 118, 124, 128, 129,136, 160, 164, 169, 170, 174, 175, 177, 180, 186, 188, 200, 204, 206, 209, 212, 214, 215, 217, 218, 251, 253, 260-262, 267, 269, 278, 279, *279*, 283, 287, 289, 300, 304, 308, 311, 312, 317, 324, 326, 345, 359, 364, 365, 368, 371, 375, 383, 385, 388, 391, 405, 409, 410, 414, 417, 423-425, 427, 431, 443, 446, 448, 453, 457, 460, 462, 466, 479, 485,

493, 509, 513, 518, 521, 533, 535, 544, 547, 552, 554, 585, 594, 600
Davidsen, David 506, 513
Davidsen, Jens 426, *426*, 585
Davidsen, Joen 203
Dánjalsmið 195
De trende Brødre 200, 201, 208
Debes, Hans 247
Debes, Hans Jacob 33, 70
Debes, Hans Jacobsen 94, 150-157, *153*, *155*, 163, 184, 185, 198, 219
Debes, Lucas 72, 121, 127, 132, 133
Degn, Anton 23-25, *24*, 28, 188, 217, 370, 391, 400, 407, 416, 494
Diana *227*
Djurhuus, Andreas 144
Djurhuus, Andreas, bóndi 565, 566
Djurhuus, Andreas, prestur 470, 565, 566
Djurhuus, Hans 474, 566, 567
Djurhuus, Hans H. 527
Djurhuus, Jens Hendrik 560-568
Don Cossack 229
Douglas, A. 174
Dundee *227*
Dunkerque 241, 286, 359
Duntzfeldt, William Frederik 444, *444*, 449-451
Duwall, Gustav 67
Dyrehaven 349

Ebenezer 314, *315*, 322, 395, 438, *438*, 439, 509
Edmondston 291
Effersøe, Gudmund 543
Eggertsson, Thráinn 42, 43, 47, 48, 50, 80, 202, 207, 594
Egholm, Jóhan Hendrik 199
Egholm, Sámal 199
Egtved handilsforvaltari 201
Ehlers 132
Eiði 246, 289, 367, 380, 387, 405, 415, 420, *420*, 421, 517, 528, 530-534, *533*, 537, 538
Elduvík 131, 559, 560
Erichsen, Jón 148, *149*
Ermasund 68
Estrup *454*
Evensen, Joen Christian 290, 400
Eystara vág *83*, 386
Eystrasalt 186
Eysturasia 170
Eysturindia 262
Eysturlandið 408
Eysturoy 215, 218, 272, 286, 305, 306, 310, 428, 491, 498, 517, 559
Eysturríki-Ungarn 45

Fair Isle 228, 289
Feideland 296
Fenger, Carl Emil 458, *458*, 459
Fibélité 359
Finnmørk 94, 147, 149
Finsen, Hjalmar 580, 585
Fjeldsted, Thorkild 92-94
Flo, Yngve 36
Flor de Muerta 381
Flor, Urbanus 226
Fløtan fríða 202
Fogh, handilsforvaltari 414
Fohrmann, Søren Laugesen 129
Forsøget 214
Fortuna 438, 505-509, 513, 534, 550
Frakland 93, 128, *128*, 338
Franz 1. 45
Frederiksdal 348
Frederiksen, Ole J. 511
Frederikshavn 335, 406, 408, 409, 414, 441, 448, 600
Freefield 292
Friese, Frideryk de 116
Friheds-Haab 433
Fríðrikur 1. 117
Fríðrikur 2. 118
Fríðrikur 3. 61, 63-68, *64*, *67*, 70, 112, 126
Fríðrikur 4. 76, 83
Fríðrikur 5. 151
Fríðrikur 6. 91, 104, 148, *148*, 201, 205, *206*, 207, 211, 216, 243, 304, *305*
Fríðrikur 7. 109, *348*, *349*, 350, 358, *361*, *368*, *468*, 481, 599
Froðba 397, 543
Fuglafjørður 131, 559, *560*
Fugloy 582
Funningur 214, 559, 560, 567
Fyn 95
Færøe (Løbner) 209, 210, 212
Færøe (Ryberg) 186, *187*
Føroya Banki 383

Gabel, Christian Carl 77, *78*, 83, 86
Gabel, Christoffer von 64, 66-71, *67*, *69*, 73, *73*, 74, 110, 112, 126, 127
Gabel, Frederik 70, 71, 73-77, *75*, *78*, 80, 83, 112, 113, 126, 128-136 *130*, *132*, 136, 180, 181, 183, 219
Gabel, Frederik Wilhelm 77
Gammeltorv *453*,
Garde, Christian Benedictus 308, 312-325, *313*, *314*, *323*
Gefion 349, *349*
Gerðum, í 511, 559
Giede, Niels 335, *340*
Gill, Duncan 291
Gisenhagen 74
Gjógv 367, 423, 559, 574
Glückstadt 66, 120, 121
Glyvrar 97, 164
Glyvursnes 378, 379, *379*
Godhavn *227*
Goodlad, John 228
Gram 350, *351*
Gravelines 359
Gregersen bøkjari 536
Griffenfeld, Peter Schumacher 72, *73*
Grimstad 397, 399
Grønland 224, 226, *227*, 228, 260, 262, 336, *339*, *341*, 353, 412, 457, 598, 603
Graah, captain 315-318, *316*, 320, 335, 338
Guinea 262
Gunnarson, Gisli 36, 37, 123
Gustafsson, Harald 36, 37
Guttesen, Rolf 20, 40, 203, 204, 207, 331
Guttormsen, Absalon 580
Gyldenkrone, Christian 87, *88*
Gyldenløve, Ulrik Christian 75, *75*, 80, 82
Gyldenløve, Ulrik Frederik 72, 76
Gyldensten 95
Gøteborg 207
Gøtugjógv 138

Haderslev 83
Hafnarfjørður 85
Hage, Alfred 475, 477, 478, 486
Haldansen, Djone 527
Haldórsvík 531, 559
Halland 68
Hambro, Joseph *344*
Hamburg 104, 117, 228, 382

Hammershaimb, Jørgen Frantz (y) 98
Hammershaimb, Jørgen-Frandz (e) 82, 90, 151
Hammershaimb, Samuel 155
Hammershaimb, V.U. *348*
Hammershaimb, Wencelaus 90, 95, 97-99, 102, 164, 171
Hanne & Marie 362-365, 368, 369, 378, 434, 435
Hansen, Andreas Nicolai 335, *344*, 345, 448
Hansen, Christen 367
Hansen, Constantin *454*
Hansen, H. 527
Hansen, Hans 127
Hansen, Hans Peter 443, 445, 446, 449
Hansen, Heine 511
Hansen, J. 527
Hansen, Jacob (Eiði) 367
Hansen, Jacob (Gjógv) 367
Hansen, Jacob (Tórshavn) 527
Hansen, Joen 527
Hansen, Just 511
Hansen, Jørgen 117
Hansen, Kristoffur 131
Hansen, Ole 527
Hansen, Peter 199, 208, 209
Hansen, Poul 415
Hansen, W.A. 148
Hanusson, Hanus 129
Hattarvík 581
Hauch, Frederik 97, 98, *98*
Havfruen 267, *279*, 312, 356, 508, 544
Havnarvág 85, *86*, 213, *379*, 406, *408*
Haxthausen, Gregers Christian 94, 95, *95*
Hay, George 290, 505
Hay, James 224-227, *226*, 292
Hay, William 292
Hákun 5. 115, 222
Hákunarson, Magnus 115
Hector 289, 380, 509, 521
Heidemann, Johan 69, 74, 126, 128
Heinason, Magnus 117, 118
Heinesen, Hans 570
Heinesen, Heini 571, 579
Heinesen, Hendrik 532
Heinesen, Jens Pauli 435, 436
Heinesen, Joen 511
Helsingør 120
Hendriksen, Poul F. 527
Herforth, Captain 265
Hestoy 383, 387, 492
Hetland 37, 41, 42, 117, 163, 182, 186, 208, 221-233, *223*, *226*, 249, 283, 289, *290*, 291-293, 296-303, *303*, 328, 333, 343, 344, 376, 381, 391, 405, 419, 423, 434, 439, 448, 455, 504-506, 516, 530, 531, 543, 550, 568, 576, 593, 598, 604
Hillswick 299
Hjortshøj, Niels Rasmussen 131, 132
Hjortshøj, Søren Rasmussen 131, 132
Hofman, Hans de 105
Holberg, Ludvig 150
Holbøll, Carl Peter 335, *341*
Holland 67-70, *69*, 118, 119, 122, 124-130, *128*, 132, 188
Holstein 64, 68, 103, 260
Holsteinsborg 335
Hompesch, baron von 206
Hoppe, Torkild Abraham 335, 346, *346*
Hoyvík 289
Hull 426, *426*, 427, 428, 431
Hunderup, Niels 247, 253-256, *256*, 266, 267, 271-275, *273*, 288, 304, 312, 336, 338, 346, 397, 443, 445-450, 597
Hvalba 200, 209, 399, 543
Hvalvík 199, 422, 528
Hvannasund 296
Hveding, Jacob Bentzon 94, 144, 145, *145*, 151
Hven 349
Hvidt, Lauritz Nicolai 335, *342*
Høegh-Guldberg, Ove 148, *148*, 149
Høgnesen, Róland 31, 79, 90, 102, 103, 105, 108
Haabet 187, 188, 189, 193
Haabet (Nólsoy) 433, 434, 509
Haagen bankastjóri 264
Haakallen 208

Idd og Marker 68, 72
Irmingarhav 358
Irminger, Carl 358-360, *359*, 365, 367, 375
Irvine, R. *225*
Irvine, Robert 290
Isachsen, Poul 527, 555, 580
Itzhoe *261*
Írland 160, 297
Ísland 21, 36, 37, 41-43, 47-50, 56, 67, 68, 70, 72, 75, *75*, 80-89, *86*, *88*, *89*, 91, 106, 108, 113, 117, 120-126, 147-150, 160, 161, 172, 182, 184-188, 200, 208-212, 254, 255, 260, 262, 279, 286, 335, *346*, 354, 355, 357, 359, 360, 362, 363, 366, 371, *371*, 375, 376, 383, 402-405, *403*, 408, 428, 447, 460-462, 472, 474, 480-482, 484, 515, 525, 565, 571, 594, 595, 603

Jacobsen, Baltsar 66
Jacobsen, bókhaldari 492
Jacobsen, Chr. M. 527
Jacobsen, Christian 97
Jacobsen, H. 527
Jacobsen, H.J. 527
Jacobsen, Jacob 527
Jacobsen, Jacob 527
Jacobsen, Jacob 566
Jacobsen, Joen 399
Jacobsen, Joen Daniel 559
Jacobsen, Jógvan 431, 433, *433*, 571
Jacobsen, Knút 367
Jacobsen, M. 494
Jacobsen, Ole 527
Jacobsen, Poul 527
Jacobsen, Thomas 511
Jacobæus, Charlotte Marie 535
Jacobæus, Holger 372, 373, *374*, 378, 380, *387*, *392*, 423, 490-498, *491*, 500, 503, 511, 513, 518, 519-527, *520*, *522*, *524*, 532-538, *536*, 541, 542, 552, 554, *563*, *572*, *599*
Jacob-Zachariassen, Andreas 555
Jakobsen, Jakob 201
Jákup 1. 124, 180, *181*
Jensen skipari 247
Jensen, Bartolomæus 135
Jespersen, Kári 31, 135, 171, 180
Jeune Alphonse 359
Joensen, Abraham 532
Joensen, Andreas 532
Joensen, Christian Johannes 421, 425
Joensen, Dánjal 212, 213, *213*, 216, 433, 541, 542

Joensen, Dánjal Jacob 309, *348*, 508
Joensen, Hans 527
Joensen, Hans 527
Joensen, Hans (Haldórsvík) 532
Joensen, Hans Andreas 169
Joensen, Hans Jacob 421, 425
Joensen, Hans Pauli 367, 368
Joensen, Hanus 138-140, *140*
Joensen, Hendrick 527
Joensen, Jacob 527
Joensen, Johan 511
Joensen, Johan K. 27
Joensen, Johannes 127
Joensen, Johannes (Klaksvík) 511
Joensen, Johannes (Tórshavn) 527
Joensen, Jóan Pauli 29, 30, *30*, 135, 145
Joensen, Jógvan 582
Joensen, Mikkjal 368, 435-437, *436*
Joensen, N.J. 571
Joensen, Nicolas 527
Joensen, Ole 511
Joensen, Ole Even 527
Joensen, Poul (Eiði) 289, *297*, 419, 530, 531
Joensen, Poul (Nólsoy) 247, 289, *297*, 431, 432, 433
Joensen, Tummas 247
Johannesdatter, Cathrine Maria *273*
Johannesen, Berint 578
Johannesen, Hans Pauli 400, 431, 433
Johannesen, Jákup 247
Johannesen, Niels 97
Johannesen, Samuel 415, 530-534, *533*
Johansen, M.N. 356-358, 365, 367, 373, 381
Johansen, Sámal Tróndur Finsson 171
Johnson, George 290
Jubelfesten 186, 188, *189*
Jubelfesten (Nólsoy) 210, 212
Jude, Anders 117
Juel, Jens 131, *132*
Juel, Niels *132*
Juel, Rasmus 78, *79*
Justinussen, Jóan 66
Justitia 130, 181
Jylland 362-365, 369, 378
Jørgensen, A.M. 367
Jørgensen, O.F.C. 469, 474, 479-481, 484, 486

Kaldbak 387
Kall, P.J. 335
Karen Knuth 362-365, 369, 381
Karen Margrethe 213, *213*
Karl sendimaður 61
Kauffeldt, Johan C.E. 524-526, *524*, 533-536, 538
Keypmannahavn 21, 36, 39, 40, 47, 48, 63, 66-69, *69*, 71, 76-78, 80, *80*, 85-88, *86*, 90, 93, 95, 97-102, 104-106, 110, 112, 117, 118, 120, 121, 127, 129, 131, 132, 137-139, 142, 145, 147-150, 154, 155, 159, *160*, 162, 164, 169, 170, 186, 200, 201, 203, 206, 209, 212-214, 216, 237, 247, 248, 250, 252, 260, 276-278, 282, 283, 289, 303, 315-317, 319, 327, 331, 336, *342*, 343, *343*, 348, *348*, 353-355, 363, *364*, 366, 382, 385, 394, 397, 402, 405, 412, 414, 416, 422, 427, 428, *429*, 431, 435, 439, 443, 444, 448, *454*, 456, 491, 494, 502, 505, 515, 517, 535, 542, 549, 567, 585, 598
Kiel 100, 106, 169, 170, 205, *206*, 211
Kirck, Niels Peter 484
Kirkja 581
Kirkjubøur 115, 387, 492
Kjeldnes, J.A. 527
Kjelnes, T.J. 579
Klaksvík 69, 263, 304, 308, 309, *309*, 315-319, 322, 388, 462, 500, 501, 503, 506-513, *507*, *510*, 516, 528, 530, 531, 534, 538
Klein, Jørgen Christian 78, 80, 81, 182
Kloss, Frederik Theodor *361*, *368*, *390*
Knudtzon, Peter Christian 264, 403-405, *403*, 419
Knuth, Eggert Christoffer 90
Knuth, Johan Heinrich 93, 95, *96*, 97
Knuthenborg 95
Kollafjørður 129, 387, 560, 578
Koltur 246, *246*, 387
Kongshavn 472
Koppen, Thomas 117
Korsgaard, Peter 139, 142, 146
Krabbe, Ludvig 484, *485*
Krabbin 188, *189*
Kragerø 433
Krebs lækni 247
Kristian 2. 116
Kristian 3. 62
Kristian 4. 81, 118-120, *119*, 124-126, 176, 180, *181*, 218, 594
Kristian 5. 65, 72, *73*, 74-77
Kristian 6. 151
Kristian 7. 92
Kristian 8. 109, 110, 304, *305*, 324, 348, 350
Kristnastova 435
Krog, Harald Andreas 571
Krogh amtmaður 351
Krúnborg *69*
Körbitz, Johan Christoffer 68, 72
Kaarsberg prestur 247

Lag, Pól á 414
Laih, Andreas Johansen 527
Lamba 164
Lamhauge, Sámal Pætursson 150
Lampe, Mads 117
Landgrunnurin 381, 577
Langasandur 528
Lange, Poul Edward 566
Langkilde, Charlotte 33-35, *34*, 577
Larsen, Petur 570, 580
Laurvig 104
Lava, Peder 527
Lava, Th. 527
Leith 207, 208
Lerwich 231, 241, 249, 291, 292, 299, 300, 505
Lillelund, Chr. F. 367
Lindenskov, Samuel 527
Lítla Dímun 194
Lofoten 584
Lolland 95
London 128, 174, 207, 294, 295, 382
Lopra 399
Lowsow, Frederik *102*, 103, 104
Lund, Anna Sophia 155
Lund, Christian 335, *337*
Lund, Claus 208
Lund, Fredrik Christian *69*
Lund, Henrich 154
Lund, Johan Michael 94-97

Lund, Ulrik Adolf 150, 154-159, *155*, 163, 164, 184-189, 192, 193, 195, 198, 219
Lunddahl, Jacob Andreas 267-269, *269*, 271, *271*, 274, 275, 288, 306, 307, 312, 317, 383, *384*, 385-393, *390*, 407, 492, 496, 497, 521, 597
Luther 117
Luxdorf 146
Lübeck 117
Lützen, Andreas Christian 566, 571, 581
Løbner, Emilius Marinus Georgius 98-110, *102*, *107*, *109*, 113, 171, 174, 175, 197, 206-212, 214, *215*, 216, 237, 595
Løgumkloster 110, 260

Madsen, Oluf 118
Magdalena Margrethe 406, 408, 409, 417
Magnusson, Árni 85, *86*
Majer, fúti 171
Malmø 120
Marcussen, Diderich 80-82, *82*
Maria 354
Marie Kristine 417
Marten, pakkhúsforvaltari 414
Martfeld, Christian 160, 161
Mary 228
Matras, Hans David 474, 566, 567, 570, 571
Matras, Samuel Michael 510, 511
Meinert, Nicolai Jonathan 445, 449, 450, *450*
Mercurius 433
Messina 331
Mesurier, la 174
Michelsen, Joen 419, 532
Michelsen, Poul Johs. 369
Miðjarðarhav 147, 186, 200, 228
Midjord, Poul 399
Miðvágur *361*, *390*, 472, 573
Mikkelsen, Joen 246
Mikkjalsson, Ólavur 131
Mikladalur 560
Minna 290
Mitens, Gabriel 62
Mohr, Mourits 289, *297*
Mohr, Nicolai 159
Moltke, A.G. 151
Moltke, Werner 99, *99*, 100
Monrad, Ditlev Gothard 476, 478, *478*
Mortensen, Andras 115
Mortensen, Arnbjørn 25
Mortensen, Daniel Jacob 566, 567
Mortensen, Johan 308, 542
Moth, Mathias 131, *133*
Muhle, Carl Adolf 216, 260, 261, 282, 315, 348
Mundt, Carl 455
Múli 131
Müller, Christian 75
Müller, Grækaris 138, 139
Müller, Hans Christoffer 470, 472, 528, 530, 534, 548, *549*, 580, 586, 587, *587*
Müller, Henrik 75
Müller, Jóhan Michael 439, 440
Müller, Marin *549*
Mykines 187
Møn 103
Mørch handilsforvaltari 280

Nansen, Hans 126, 131, 135
Napasok 335
Napoli 331
Neptunus 418, 422-426, *424-426*, 428, 431, 502, 544, 545
Nes 304
Newcastle 364
Niclasen, Andreas 527
Niclasen, Hans 246, *246*
Niclasen, Joen J. 527
Niclasen, Thomas 527
Niðarósi 115
Nielsen, C.F. 79
Nielsen, Zacharias 582
Niklas prestur 116
Nolsøe 247-249, 314, 432
Nolsøe, Jákup 208, 244, 247, 249, 253, 254, 267, 274, 275, 277, 280, 281, *281*, 283, 307-310, *311*, 313-325, *314*, *323*, 329, 377, 378, 380, 395, 400, 401, 438, *438*, 491, 492, 495, 497-499, 502-504, 507-509, *510*, 516, 518-524, *524*, 530, 531
Nolsøe, Jens Pauli 31, 135, 171, 180
Nolsøe, Jógvan Djonesen 395-401, *396*, 506, 507
Nolsøe, Páll J. 25, 27, *27*, 28, 215, 247, 426
Nolsøe, Poul Joensen 518-520, 542-544, *544*
Nolsøe, Poul P. 192, 201-207, *202*, *206*, 211, 212, 215, *215*, 216, 219, 226
Nordfeldt 103
Norðhavið 272, 394, 419, 528, 558-560
Norðoyggjar 127, 129, 203, 215, 252, 258, 272, 286, 426, 498-500, *499*, 506, 510, 511, 517, 559, 567, 570
Norðoyri 559
Noreg 36, 41, 56, 64, 65, 68, 72, 74, 76, 77, 94, 95, 105, 106, 113, 115, 117, 120, 156, 170, 174, 185, 188, 282, 381, 397-399, 423, 425, 432, 434, 571, 584
North star 207
Nólsoy 186, 188, *189*, *191*, 192, 208, 211, 247, 289, 367, 400, 405, 492
Nólsoyarfjørður 69
Nykøbing 423, *424*, *425*, 427
Ný Fundland 123, 188, 195
Nødvendigheden 208

Ocksen, Henrik 87, 88
Odense 90, 578
Ogilvy, Charles (e) 292
Ogilvy, Charles (y) 283, 291-294, *301*
Ogilvy, Margaret 292
Oleron 188
Olesen, Joen 511
Olesen, Joen Peder 532
Olesen, Rasmus 581
Olsen, Augustinus 527
Olsen, C.M. 435
Olsen, Christen 208
Olsen, Christopher F. 511
Olsen, Dánjal 399
Olsen, Hans 571
Olsen, Hans Petur 367, 421
Olsen, Joen 421
Olsen, Johan 566, 582
Olsen, Johannes 578
Olsen, Knud 532
Olsen, Lauritz 98, 167, 168, *168*
Olsen, madam 415
Olsen, Peter 511
Olufsen, Elias 131
Ongland 44, 68, 124, 167, 222, 226, 297, 364, *398*, 410, 426, 448, 505
Orknoyar 228, 298, 455
Ostende 241, 356, 382

Outzen, Andreas 422
Oyndarfjørður 296, 559, 560
Oyrarsund 66, 68, 69, *69*, 137
Oyri 164

Ólafsvík *356*

Patursson, Erlendur 28, *29*, 31
Pedersen, Elias 511
Pedersen, Hans 367
Pedersen, Karl Peder 35, 92, 105
Pedersen, Niels 97
Pedersen, Peder 558, 559, *560*
Pedersen, Samuel 78
Pedersen, Sigvard 558, 559, *560*
Pennant, mr. 293, 294
Peterhead Paelet 291
Petersen, Elias 581
Petersen, Johannes 561, 562, 565-567, *566*
Petersen, Johs. Michael Hans 367, 369
Petersen, Mads W. 527
Petersen, Poul 26, 27, 53
Petersen, skipari 364, 365, 369
Petkum, Simon de 128
Pingel, Christian 335, *339*
Platon 154
Plesner 445
Plover 290
Pløyen, Christian 21, 29, 30, 38, *107*, 221, 224, 233, 244, 246-250, 253-256, *255*, 263, 266, 267, *269*, 271, 274-304, *276*, *281*, *285*, *290*, *292*, *295*, *297*, *301*, *303*, 308-313, 321, 322, 326, 327-330, 333-339, 342, 346, 356-383, *371*, 391-394, 397-402, 405, 406, *408*, 412, 418-421, 423, 431, 432, 435, 436, 440, 443, 453-455, *454*, 462, 463, 466, 490, 496, 508, 531, 540, 552, 568, 586, 597, 598, 600
Porkeri 435
Pottinger, Arthur 290
Poulsen, Claus 154
Poulsen, Hans 415
Poulsen, Joen 532
Poulsen, Jógvan 66
Poulsen, Jóhan Henrik 415, *415*
Poulsen, M.P. 527
Poulsen, Th. 527
Proeck, Christian Lebrecht von 88, 90, 153
Prytz 566

Raben, Peter 76, 82-87, *83*, *85*, *86*, 90, 113, 137-139
Randers *454*
Ranke, Leopold von 23
Rantzau, Otto Mandrup 88, *89*
Rasmussen, Guttorm 131
Rasmussen, Peder 127
Rée, Bernard 455
Reinert, frú 415
Restorff, M.C. 434, 439
Reventlow greivi 205
Reykjavík 403
Ribe 86, 99
Ringkøbing 267
Ringsted 74
Robinson, James A. 43, *45*
Robring, Eva Margrethe 82
Rosenørn, Mathias Hans 460-462, *461*, 464, 476, 478, 479, 522
Rosenvinge, Frederik Willumsen 66
Roskilde 70, 90, 93, 260, 265, 352, 403, *452*
Royndin 436, 437
Royndin Fríða 202-208, *215*
Róbertsdóttir Hrefna 36, 37
Rugård 90
Rundingur *417*, 418
Ryberg, Niels 186, 187, *187*, 189, 191, 197, 199, 200, 226, *226*, 270
Rye, Didrik Hegermann 582, 584, *585*
Ræder kapteyn 349
Rættará 247, 418

Salicath, Peter 265
Saltnes 428, *429*
Samuelsen, Augustinus 527, *529*
Samuelsen, Peder 151
Sandagerð 379, 386
Sandagerðisnes *517*
Sandavágur 251, 258, 435, 541
Sandlodge *298*
Sandoy 272, 380, 387, 416, 491, 498
Sandur 465, 472
Sass, Mathias Wilhelm 335, 343, *343*, 344, 346
Savignac 170
Scalloway *225*, 231, 292, 293, *293*, 295, 299
Scepperus, Cornelius Duplicius 116

Schiern, Frederik 455
Schrøter, J.H. 56, 69, 70, 86, 111, 112, *112*, 158, 170, 171, 244, 247, 253, 254, 261, 262, 267, 274, 304, 307, 558
Schumpeter, Joseph 46, 158
Sehested, Hannibal 66
Seistrup skipari 509
Selatrað 565, *566*, 567
Sevel, S. 105, 106,
Seyen 350, 354-362, *361*, 366, 367, 369, 373, 374, 394, 421
Sikiloy 331
Sivertsen, Augustus 369
Sivertsen, Petur Hans 423, *424*, 427, 428, 470, 474
Skagerak 207
Skanderborg 100
Skansatangi *604*
Skálabotnur 215
Skálafjørður 187
Skálavík 56
Skálholt 85
Skibsted, Andreas Wilhelm 363, 366, 385, 393, 406-418, *406*, *408*, *410*, *413*, *415*, *417*, *418*, 441, 473, *473*, 474, 518, 521, 545-547, *547*, 600
Skibstedstangi *408*
Skinkel, Niels 123
Skopun 415, *415*
Skotland 174, 208, 222, 224, 226, 249, 296, *297*, 302, 303, *303*, 349, 448
Skougaard, Søren Pederseen 127
Skúgvoy 383
Skaale, Niels 348, *348*
Skåne 68
Slesvík 64, 260-265
Smit rentuskrivari 139
Smith, Richard John 228
Sommer, Frederik 406-408, *406*
Sorø 74, 109, *346*
Sovereign *303*
Spania 124, 186, 297, 298, 381, 382, 479
Spitsbergen 124
Sponneck, Wilhelm Carl Eppingen 463, *463*, 468
Steigargarður 96
Steining, Jørgen 577, 578
Stemann, Christian Ludvig 148, *148*, 190
Stemann, Poul Christian 109
Stenness *223*

Stephensen, Ólaf 89
Strendur 387, 558
Streymoy 272, 490, 498, 517, 527, 530, 559, 568
Struensee, Johan Friedrich 143, 148, *148*, 158, 159
Struer próstur 244, 247
Suðuramt 515
Suðuroy 69, 81, 85, 121, 127, 131, 165, 175, 187, 192, 201, 202, 205, 208, 211, 213, 252, 258, 272, 295, 359, 376, 383, 400, 426, 445, 498, 499, 509, 542-545, 549, 567, 571
Suhm, P.F. 160
Sukurtoppur 335
Sumburgh Head 289, 290
Sundalagið 422, 528, *530*, 532
Svabo, Jens Christian 56, 150, 159-163, *160-162*, 188, 190-196, *190, 191*, 219
Sverri kongur 61
Svínoy 203
Svøríki 63, 68, 79, 84, 115
Syðrugøta 131, 559
Sæland 21, 72, 90, 91, *91*, 93-95, 97, 100, 101, 103, 104, 423, *424*, *425*, 595
Søldarfjørður 213
Sølling, Peter Norden *398*
Sølvará, Hans Andrias 33
Sørensen, Hans Jørgen JJacob 565, 566, 571
Søridderen 83-85
Sørinarson, Pætur 129
Sørvágur 69, 373, 415

Tangin í Bug *408*
Ter Veere 116
Thetis 349, *349*
Thim, Joachim 117
Thodal, Laurits 89, 90
Thomasen, Christian 511
Thomasen, Samuel 511
Thomsen, Jes 403
Thomsen, T.F. 405
Thorshavn 212, 216, 259, 313, 314
Thorsteinsson, Bjarni *171*, 172, 173, 362
Thorsteinsson, Jákup 31, 32, 443, 451
Thule 228
Tillisch Christian Ludvig 21, 107, 109, *109*, 110, 113, 176, 214, *215*, 219, 260, 262-265, 280, 342, *348*, 350, 351, *351*, *352*, 595
Tillisch, Frederik Ferdinand 21, 38, 56, 109, 110, 176, 237-259, *239*, *245*, *255*, 265, 266, 267, 270, 271, 275, 277, 288, 342, 352, *352*, 395, 464, 466, 481, 482, 576, 588, 596, 597
Tinganes 70, *83*
Tjørnuvík 380, 517, 528, 531, 559
Toftir 387, 492, 558
Torbek 349
Tordenskjold 80
Tórshavn 21, 47, *79*, 125, 127, 128, 131, 138, 144, 158, 159, 167, 169, 173, 186, 191, *191*, 192, 197, 204, 206, 208, 214, *226*, 238, 243, 247-249, 252, *252*, 259, 260, 270, *271*, 280, 288, 304, 308, 310, 313, 323, 345, 356, 357, 359, 362, 364, 367, 369, 373, 374, 377, 378, *378*, 380-382, 385-387, 400, 407-409, *410*, 412, 414-416, 418, 422, 426, 432, 434, 435, 439, 462, 466, 482, 490, 492, 493, 495, 498-500, 503-517, *507*, *515*, 528-535, 540, 541, 544, 548-550, 554, 558, 565, 576, 588
Trellund, Eberhard 127
Trellund, Jonas 126, 127
Treschow, Frederik 265
Trevelyan 262
Trongisvágur 167, 258, 396, 482
Tróndheimur 94, 209
Trøllanes 560
Tscherning, A.F. 477, *477*, 478
Tveraa 395, *398*, 399-402, 440
Tvøroyri *257*, 376, 395, *396*, 398, 400, 401, 405, 435, 462, 500, 501, 503, 509, 542, 544
Týskland 50, 117

USA 149

Vaila 298
Valkendorf, Kristoffer 117, 118
Vágar 96, 258, 272, 328, 416, 465, 474, 498
Vágsbotnur 186, 209
Vágur 174, 202, 213, 258, 290
Velbastaður 387
Venus 283
Vestara vág 386, 428
Vestmanna 69, 174, 258, *259*, 309, 359, 373, 435, 462, 509, 578
Vestmannaoyggjar 120, 354
Vesturindisku oyggjarnar 88, 106, 262
Viborg 87
Viðarnes *494*, *517*, *604*
Villumsen, Hans 132

Weichmand, Joachim 118
Weihe, Johan Henrik 78
Weihe, S.J. 559, 571
Wenningsted, Jens 561, 562, *562*, 565, 571
West, John F. 32, 33, 56, 70, 82, 85, 87, 137, 140, 245
West, Niels 92
Wexelsen, Hans Leganger 173, *173*
Weyhe, Joen 96
Weyhe, Jóhan Hendrik 213-216, *215*, 219, 237, 399
Weyhe, Jóhan Hendrik (løgmaður) 129
Weyhe, Peter Christian 580, 581
Winther, Mads Andreas 470, *470*
Winther, Niels 474-479, *475*, *478*, 482, 566, 567, 570, 571
Wishart, George 290
Wolf, Niels Giessing 335
Wouwerman, Pieter *128*
Wullenweber, Jaochim 116, 117
Wullenweber, Jürgen 117
Wylie, Jonathan 144, 147, 198

Zachariassen, Jacob 251, 474, 567
Zachariassen, Louis 180
Zahrtmann 349, 371, *371*, 372
Zeverinsen, Jacob 527

Ørsted, Andreas Sandøe 108, 468, 469, *469*, 479, 481

Åbenrå 110, 260, 350
Ålborg 352